Nevndin ásannar, at skilagott hevði verið, um tær ymisku útbúgvingarnar í so stóran mun sum gjørligt vóru samskipaðar á so fáum plássum sum møguligt. Nevndin er sannførd um, at illa ber til at tosa um útbúgvingar uttan samstundis at taka støðu til fíggjarliga grundarlagið. Tað er tí av stórum týdningi at fáa greiðu á, hvussu nógv tær ymisku útbúgvingarnar kosta, og eisini er neyðugt at fáa til vega stýringsamboð, sum kann tryggja játtandi myndugleikunum, at mest møguligt fæst fyri tann pening, sum verður goldin til tær ymisku útbúgvingarnar.

Búsetingarmynstrið og næringagrundarlagið annars í Føroyum talar tí fyri, at vit í framtíðini skipa okkara útbúgvingar í deplar við t.d. felags bygningi, leiðslu, umsiting o.s.fr.

Nevndin er samd um at heita á landsstýrið at koma við uppskoti um skipan av miðnámsdeplum, har støða er tikin til undirvísingar- og rakstrarliga partin, samstundis sum greiða er fingin á, hvørjar útbúgvingar skulu/kunnu húsast í hesum miðdeplum.

Nevndin er samd um, at føroyskt eigur ikki tann sess í skúlaverkinum, sum tað hevur uppiborið.

Nevndin mælir til, at tiltøk verða sett í verk, ið skapa vend í á hesum økt.

Fyri at náa hesum setningi, eiga skúlamyndugleikarnir at slóða fyri, at undirvísingartilfarið verður á føroyskum í øllum skúlum landsins.

Somuleiðis eigur at verða kravt, at útlendskir lærarar, ið eru settir í starv í føroyska skúlaverkinum, skilja føroyskt mál og leggja seg eftir at tala og skriva tað.

Samsvarandi frammanfyristandandi setir samd nevnd fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Nevndin mælir til, at landsstýrið í hesi tingsetu leggur fyri løgtingið fylgjandi uppskot til løgtingslóg um:

1. yrkisútbúgving innan tøkni,
2. ástøðisútbúgving innan tøkni,
3. nýggjar ástøðisútbúgvingar (student/HF),
4. skipan av miðnámsdeplum.

Løgtingsmál nr. 3/1991: Miðnámsútbúgvingar.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur upp til umrøðu tey útbúgvingar- og skúlatilboð, vit hava til ungdóm okkara eftir fólkaskúlan, tær sonevndu miðnámsútbúgvingarnar.

Viðmerkingar

Sum grundarlag fyri orðaskiftið verður lagt fram upprit: MIÐNÁM 91.

4. Landsstýrismál

Hjálagt verða send løgtinginum 10 avrits eintøk av gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 31. juli 1990 til 26. juli 1991.

Broytingaruppskot

til

Løgtingsmál nr. 4/1991: Landsstýrismál.

Á tí fyrsta fundinum í nývalda landsstýrinum tann 16. januar 1991 hava landsstýrismenninir sum vanligt undirskrivað, at teir m.a. vilja halda heimastýrislógina.

Í hesi lóg stendur, at myndugleikin hjá hesum sama Føroya Landsstýri er ein ræðisavmarking, sum altíð skal akta tær til eina og hvørja tíð fyri ríkið galdandi traktatir. Eisini er ásett, at ríkismyndugleikarnir hava avgerðarættin í øllum málum mótvegin útlandinum.

Hesar ásetingar vátta m.a., at komandi fólkaatkvøðan í Danmark fær týdningarmiklar avleiðingar fyri tað føroyska samfelagið, tí her verður støða tikin til ta týdningarmiklastu traktatina higartil, sjálva Maastriebtraktatina.

Landsstýrismenn hava eisini skrivað undir uppá, at ríksistýrið hevur skyldu til at leggja fyri heimastýrið traktatir, sum samtykkjast skulu, og sum koma at nerta við serlig føroysk áhugamál.

Maastrichttraktatin kom kortini ikki á tingborð fyrr enn tann 23. mars, meðan landsstýrið legði eina kladdu til eitt fólkatingsuppskot fyri tingið eina viku frammanundan um at góðkenna, at fólkaatkvøðan um hesa somu traktat ikki skal haldast í Føroyum.

Eftir tí, ið kom fram um ríkisrættarligu støðu Føroya undir viðgerðini av hesum máli, so kom uppskotið um ikki at taka lut í fólkaatkvøðuni eisini, áðrenn landsstýrið hevði sæð sjálva traktatina. Sigast má, at landsstýrið og løgtingið fara sera leett um framtíðar lagnu Føroya lands og Føroya fólks.

Á landsstýrisfundi tann 5. mars í 1991 samtykkir landsstýrið at velja eina 3-manna nevnd til at gera uppskot til eina arbeiðsloysisstuðulsskipan og eina arbeiðsávísingarskipan. Ongastaðni sæst nakað úrslit av hesum arbeiði.

Á landsstýrisfundi tann 5. mars 1991 samtykkir landsstýrið at geva eftir í undirgrundarmálinum og letur mótpartinum upp í hendi at tilevna eina rammulóg um "ráevni í undirgrundini". Henda rammulóg kemur eins og aðrar rammulógir at seta karmar um, hvønn veruligan myndugleika løgtingið fær á hesum øki.

Niðurstøðan kann tí bara vera hon, at løgtingssamtyktin um yvirtøku av undirgrundarmálinum til sermál og áralongu samráðingarnar um hetta mál eru sleptar

til fyrimuns fyri einari lunkaðari avtalu millum Javnaðar- og Fólkaflokkin, sum letur danir, og nú EF, framyvir eiga veruliga valdið á hesum týdningarmikla øki.

Á landsstýrisfundi 26. mars 1991 verður samtykt at játta 994.370 kr. til nýggjar møblar o.a. til Smyril. Eftir upphæddini skilst, at tikið er av einum tilboði, sum komið er uttaneftir.

Sama mannagongd við at innflyta arbeiðspláss er nýtt við ymiskum umvælingum av Teistanum, har útlendingar hava gjørt vanligt skipasmíð umborð, meðan føroyskir handverkarar hava gingið fyri einki.

Hildið verður, at tað er burturav merkisverd mannagongd at fara í útlondini eftir tilboðum og síðani at taka av teimum, meðan 3.861.600 kr. fyri sama mánað verða goldnar m.a. handverkarum í egum landi fyri at ganga fyri einki, og skipasmiðjurnar liggja stillar.

Samlaðu veitingarnar vegna arbeiðsloysi eru øktar úr 18 mió. kr. í 1990 upp í 45 mió. kr í 1991, og staðfestast kann, at Javnaðarflokkurin hevur stórskemtað, tá ið hann lumpaði seg fram at valdinum í Tinganesi við at lova arbeiði til allar vinnuførar hendur og at fáa hjólini at mala aftur. 7.286 veitingar fóru í 1991 um Almannastovuna móti 3.332 árið fyri. Bara í mars mánað í ár fingu 835 fólk 4,6 mió. kr. í forsorgarhjálp vegna arbeiðsloysi.

Á landsstýrisfundi tann 20. juni 1991 sæst, at landsstýrið hevur avgreitt mál viðvíkjandi ríkisborgararættindum eftir tilmæli frá stjórnini. Hildið verður, at løgtingið hevur verið stuttskygt í avgerð síni við at geva landsstýrinum heimildina til at avgreiða mál av hesum slagi einsamalt, serliga nú, ið ríkisborgararættindi tykjast vera lættkeypt vøra, síðani Danmark fekk størri skyldur mótvegis EF enn mótvegis Føroyum.

Á landsstýrisfundi tann 25. juni 1991 samtykkir landsstýrið at góðkenna rokn skapin fyri Strandfaraskip Landsins fyri árið 1990 við teirri viðmerking, at skundað verður undir at broyta bygnaðin.

Frásæð tí, at tað almenna nú aftur er farið undir at reka almenna millumlandasigling við Smyrli við slangu í landskassan, so eru ongar broytingar løgtinginum kunnugt gjørdar í bygnaðinum hjá Strandferðsluni.

Nevnast skal eisini, at seinast stjórnarflokkarnir sótu saman í landsstýri, sleit Fólkaflokkurin samgonguna, júst tí at tað overvaði borgarligu sál hansara, at farið var undir millumlandasigling við hesum sama skipi. Nú umsitur sami flokkur hetta sama mál og er vorðin heitur og svorin talsmaður fyri tí, sum hann var ímóti.

Skoytast kann uppí, at tað í samgonguskjalinum stendur, at "Virksemið hjá Strandferðsluni verður ikki økt.".

Landsstýrisfundurin tann 9. juni 1991 líkist mest av øllum einari kvettroynd hjá Javnaðarflokkinum. Henda dag møtir eingin fólkafloksmaður á landsstýris-

fundi, og Javnaðarflokkurin tekur einsamallur sera týðandi avgerðir í skúlamálum, har flokkurin samtykkir at flyta lógarásetta Sjóvinnuskúlan úr Suðuroy norður til Klaksvíkar.

Somuleiðis samtykkir Javnaðarflokkurin einsamallur at játta 500.000 kr. til at stovna eina deild undir Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og eina deild undir Føroya Handilsskúla í Suðuroy.

Løgtingið kennir ikki veruligu rakstrartølini, tí at upphæddin er tvinnað saman við UIF og fólkaskúlanum.

Leiðslurnar í Vestmanna og í Havn vita av ongum. Deildirnar í Suðuroy søkja eftir næmingum, men mugu taka lýsingarnar aftur, tí tær eru sendar út í heimildarloysi.

Í fyrsta lagi verður Landsskúlaráðið lopið um í sjálvari málsviðgerðini. Í øðrum lagi verður lógarásettur skúli í Suðuroy fluttur til Klaksvíkar. Í triðja lagi er játtaða upphæddin als ikki í samsvari við veruleikan. Í fjórða lagi eru ongar fyrireikingar gjørdar, so hvørki høli ella næmingar eru tøk ella fyrireikað til hetta mál.

Úrslitið í dag er, at so fáir næmingar birða at søkja sær hesa útbúgving í Suðuroy, at vandi er fyri, at hon fer fyri bakka. Endaliga úrslitið nærkast tíverri tí, sum spátt varð, suðuroyingar mistu Sjóvinnuskúlan og fingu einki í staðin.

Stórmál eru als ikki nevnd í gerðabók landsstýrisins. Hvussu mong tey eru, er ilt at vita og verri at kanna.

Vísandi til frammanfyri nevnda og :

a) tað sera ótryggu og støðugt versnandi støðu, samfelagið er komið í fíggjarliga og samfelagsliga,
b) allar tær skeivu og soleiðis lítið álitisvekjandi forsøgnir landsstýrisins higar til um framtíðarútlitini í skiftandi nýggjárs- og løgmansstøðum og annars í orð og tal, innan og uttan tinggátt,
c) tað almenna stríð, har tikið verður undir við andstøðuni í atlitinugum hennara við skuldsetingum um dugnaloysi innan egnu málsøki og samgongueflokkanna millum,
d) duldarfulla og óskiljandi atgerðarloysið í ESF málinum,
e) v.m.

verður skotið upp soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið leggur frá sær beinanvegin.

Álit II

í

Løgtingsmáli nr. 4/1991: Landsstýrismál.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur gerðarbøkurnar hjá landsstýrinum nevndu tíðarskeið til eftirtektar.

5. Tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur støðu til, hvørjar tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs frá árunum 1985-1990 landsstýrið skal fyrireika til framlogu í tinginum sum serstok mál.

Viðmerkingar

Landsstýrið hevur frá Løgtingsskrivstovuni fingið sær "rekommandatiónir", sum Tingmannaráð Útnorðurs hevur gjørt í tíðarskeiðinum 1985 til og við 1990.

"Rekommandatiónirnar" heita á landsstýrini í Grønlandi og í Føroyum og Íslendsku stjórnirnar um at taka ávís stig í ávísum málum. "Rekommandatiónirnar" eru sum vanligt orðaðar sum áheitanir, men av tí, at flest allar "rekommandatiónirnar" - um tær verða framdar - kosta pening, og at einki er nevnt um kostnað ella umfigging, kann tað ikki haldast at vera rætt, at landsstýrið við støði í "rekommandatiónunum" fyrireikar málini og leggur tey fyri løgtingið sum sítt egnt.

Tí verður mælt til, at Løgtingið tekur støðu til, hvørjar "rekommandatiónir" landsstýrið skal fyrireika til framløgu í tinginum sum serstok mál.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 5/1991: Tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. september 1991 og eftir 1. viðgerð tann 23. september 1991 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Nevndin vísir á tiltøk, sum Tingmannaráð Útnorðurs hevur samtykt skulu fara fram í 1992, og at tað tí hevur skund at avgreiða málið.

Annars verður vísst til álit løgtingsmáli nr. 63/1991.

6. Brenni- og samskiftis-studningur

Løgtingslóg

um

Brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v.fl.

§ 1.

Í fíggjarárinum 1991 verður úr landskassanum veittur ein brenni- og samskiftistudningur til pensjónistar við 1.943 kr. til hvønn pensjónist.

§ 2.

Brenni- og samskiftisstudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. december 1991 hava fingið játtaða fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón ella hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí at rætturin til hana er uppnáddur, og seinni fáa pensjónina játtaða.

§ 3.

Treytin fyri at fáa brenni- og samskiftisstudning er, at pensjónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensjónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensjónini pr. 1. december 1991. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

Brændsels- og kommunikationstilskud til visse pensionister m.fl.

§ 1.

I finansåret 1991 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister på 1.943 kr. til hver pensionist.

§ 2.

Brændsels- og kommunikationstilskud ydes til personer, som inden den 1. december 1991 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3.

Betingelsen for at få brændsels- og kommunikationstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt udover pensionen end 80.000 kr. for ægtepar og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. december 1991. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4.

Í fíggjarárinum 1991 verður úr landskassanum eisini veittur ein brenni- og samskiftisstudningur við 1.943 kr. til fólk, sum tann 1. december 1991 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 4.

I finansåret 1991 ydes af landskassen også et brændsels- og kommunikationstilskud på 1.943 kr. til personer, der den 1. december 1991 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som i § 3 i denne lov.

§ 5.

Brenni og samskiftisstudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.

Stk. 2. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brenni- og samskiftisstudninginum um hendi.

Stk. 3. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ 5.

Brændsels- og kommunikationstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.

Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændsels- og kommunikationstilskuddet.

Stk. 3. Afgørelse, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ 6.

Brenni- og samskiftisstudningurin er ikki skattskyldugur.

§ 6.

Brændsels- og kommunikationstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7.

Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

§ 7.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Síðani 1980/1981 hevur verið goldin brennistudningur til pensjónistar v.fl. sambært løgtingslóg, ið einans hevur havt gildi fyri viðkomandi fíggjarár.

Í 1988 og 1989 verður ein stuðul til lutvísa rindan av samskiftisúrreiðslum sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald lagdur afturat brennistudningunum og í 1988 og 1989 vórðu 2.200 kr. veittar pensjónistum v.fl. í brenni- og samskiftisstudningi.

Á fíggjarlógini 1989 vórðu játtaðar 7.360.000 kr. til brennistudning og á fíggjarlógini 1990 eru játtaðar 6.500.000 kr.

Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning í 1990 var einsljóðandi við lógina fyri 1988 og 1989, tó so at upphæddin lutfalsliga varð lækkað til 1.943 kr. samsvarandi lækkaðu játtanini í 1990.

Játtanin á fíggjarløgtingslógini 1991 er tann sama sum í 1990, og setir landsstýrið tí fram einsljóðandi lógaruppskot viðvíkjandi brenni- og samskiftisstuðningi í 1991 sum í 1990, t.v.s. 1.943 kr. til hvønn pensjónist.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 6/1991: Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstuðning til ávísar pensiónistar:

Málið er framlagt av landsstýrinum 19. september 1991 og eftir 1. viðgerð 23. september 1991 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9. oktober 1991, og mælir ein samd nevnd í løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Nevndin er eisini samd um, at heita á landsstýrið um at kanna galdandi lóggávu, við tí fyri eyga at fráboða tinginum, um tørvur er fyri broytingum í galdandi stuðulsskipan.

7. Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, pkt. 5 verður orðað soleiðis:
"*Húsarhaldsvørur, sanitetsvørur og pýðisluti:*

A. Úr glasi, keraniskum tilfari ella marmori:

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgift m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1959 med senere ændringer om indførselsafgift m.v. foretages følgende ændringer:

1. § 1, pkt. 5 affattes således:
"*Husholdningsartikler, sanitetsartikler og dekorationsgenstande*

A. Af glas, keramisk materiale eller marmor:

5.01. Borðbúnaður, køks- og aðrir húsarhaldslutir, toiletlutir, statuettir og aðrir innanhýsis prýðislutir (HS 69. 11, 69.12, 69.13 og 70.13) av virðinum 30%.
5.02 Sanitetsvørur (vøsk, W.C., baðikør o.s.fr.) av virðinum 15%.
B. *Úr øðrum tilfari:*
5.03 Statuettir og aðrir innanhýsis prýðislutir, uttan mun til tilfarið av virðinum 30%"

5.01. Bordservice, køkken- og husholdningsartikler, toiletartikler, statuetter og andre indendørs dekorationsgenstande (HS 69.11, 69.12, 69.13 og 70.13) af værdien 30%.
5.02 Sanitetsartikler (vaske, W.C., badekar o.s.v.) af værdien 15%.
B. *Af andet materiale:*
5.03 Statuetter og andre indendørs dekorationsgenstande, uanset materialet af værdien 30%.

2. Í § 1 verður pkt. 13 strikað.

2. I § 1 ophæves pkt. 13.

3. § 1, pkt. 15 verður orðað soleiðis:
"15. *Luktilsi, kosmetikk og sápa.*
15.01 Alt til hold-, hár og munn røkt, óparfumerað eins og parfumerað, eisini øll sløg av hondsápu, í føstum og flótandi líki av virðinum 25%."

3. § 1, pkt. 15 affattes således:
"15. *Parfume, kosmetik og sæbe.*
15.01 Alle præparater til hud-, hår- og tandhygiejne, uparfumerede såvel som parfumerede, samt alle slags håndsæbe i fast eller flydende form af værdien 25%."

4. § 1, pkt. 24 verður orðað soleiðis:
" 24. *Skreytvørur, bijouterivørur, pynt- og skemtvørur.*
24.01 Juvelérarbeiði (HS 71.13), bijouterivørur (HS 71.17), vørur úr náttúru- ella kulturperlum, gimsteinum ella hálvgimsteinum (HS 71.0-6), pyntlutir at nýta til høgtíðir, eins og grýlu- og aðrir undirhaldslutir, fróknað ganda og skemtilutir (HS 95.05) av virðinum 30%."

4. § 1, pkt. 24 affattes således:
"24 *Pyntegenstande, bijouteriprodukter, pynte- og skæmteartikler.*
24.01 Juvelérarbejde (HS 71.13), bijouterivarer (HS 71.17), varer af natur- eller kulturperler, ædel- eller halvædelsten (HS 71.16), pyntegenstande til brug ved højtider samt karnevals- og andre underholdningsartikler, herunder trylle- og skæmteartikler (HS 95.05) af værdien 30%."

5. Í § 1 verður pkt. 26 strikað.

5. I § 1 ophæves pkt. 26.

6. § 1, pkt. 28, verður orðað soleiðis:
Blómur og pottaplantur; kunstigar blómur.
28.01 Øll sløg av blómum og pottaplantum; kunstigar blómur av virðinum 25%."

6. § 1, pkt. 28, affattes således:
Blomster og potteplanter; kunstige blomster.
28.01 Alle slags blomster og potteplanter; kunstige blomster af værdien 25%."

§ 2.

Vørur, ið fáa tollin niðursettan eftir hesari lóg, kunnu ikki fáa tollin endurgoldnan, um vørurnar verða útfluttar.

2 stk. Vørur komnar til landið, men enn ikki tollgreiddar, verða tollaðar eftir hesari lóg. Vørur, komnar til landið undir tollkreditskip-anini, kunnu eisini verða tollaðar eftir hesari reglu, um tær enn eru á goymslu flutningsfelagsins ella ikki eru upppakkaðar.

§ 2.

Varer, som får tolden nedsat i henhold til denne lov, kan ikke få refunderet tolden, hvis varerne bliver eksporteret.

Stk. 2. Varer, som er kommet til landet, men endnu ikke toldklareret, skal fortoldes i henhold til denne lov. Varer, som er kommet til landet under toldkreditordningen, kan også fortoldes efter dette princip, hvis de endnu opbevares på transportørens lager eller endnu ikke er udpakket.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar

Í sambond við fíggjarlógarviðgerðina varð borið fram í løgtinginum, at landsstýrið fór at umhugsa ávísar tollækkingar.

Umframt skrásetingargjaldið á aklørum varð hugsað um vørur, ið hava serliga høgt tolltrýst, hvar handilin tí í mongum førum er lítil og eingin. Hetta eru eisini ofta vørur, ið verða keyptar uttanlendis, tá fólk ferðast, t.d. luktilsi og kosmetikk, ymiskir skreytlutir undir lp. nr. 24 o.s.fr.

Tollurin á hesum vørum er í løtuni serligt og eyka innflutningsgjald (33%) og innflutningsgjald (punktgjald) eftir 1950-lógini (100%).

Uppskotið er bygt upp soleiðis, at bólkurin lp.nr. 24, ið umfatað nógv ymisk sløg av skreyti, prýðislutum o.s.fr., er settur til 30% eins og lutir úr sama bólki, framleiddir úr aðalmetalli o.s.fr. (núverandi lp. nr. 24.01). Samstundis er bólkurin avmarkaður til *Skreytvørur; bijouterivørur; pynt-* og *skemtivørur;* meðan prýðislutir o.l. er flutt til lp. nr. 5, sum framman undan bert umfatað ávísar glasvørur, men fær heiti *Húsarhaldsvørur, sanitetsvørur* og *prýðislutir;* sum síðani verða býttir upp eftir tilfari. Í hesum bólki eru sanitetsvørur (fyrr lp. nr. 13, sum verður strikað) sett til 15%, meðan restin av bólkinum verður sett til 30%.

Heitið á lp. nr. 15 er broytt til *Luktilsi, kosmetikk* og *sápa,* men vøruinnihaldið er óbroytt. Bólkurin varð býttur upp í lp. nr. 15.01 *sápa, shampoo, tannpasta* ella *pulvur* við 25% og 15.02 restin við 100%. Í uppskotinum verða allar vørur í einum bólki 15.01 og gjaldið sett til 25% av virðinum.

Ein uppgerð yvir innflutningin í 1990 av vørum, ið verða tollaðar við 100+33%, vísir eitt samlað tal upp á umleið 6,8 mió. kr., harav er bólkurin undir lp. nr. 15 (luktilsi, hondrøkt o.s.fr.) 5,5 mill.kr.

Eftir hesum G-tali hevur hesin bólkur í 1990 givið umleið 9 mill. kr. í tollinntøku, meðan tollinntøkan, roknað eftir uppskotinum, hevði verið umleið 4,5 mill.kr., t.v.s at tollinntøkan við óbroyttum innflutningi hevði farið umleið niður í helvt.

Í pkt. 5 í uppskotinum er lp. nr. 26, ið umfatar ur, strikað. Tollurin var 20%. Innflutningurin av urum, ið høvdu komið undir henda bólk, var í 1990 undir 700.000 kr., so mista tollinntøkan orsakað av hesari broyting hevði verið einar 140.000 kr.

Í pkt 6 viðvíkjandi lp. nr. 28 eru "kunstigar blómur" settar afturat. Hesar vóru fyrr undir lp. nr. 24 skreyt o.a.

Við hesum uppskoti um broytingar í teimum hægst tollaðu vørunum vónar landsstýrið, at handlandi á hesum økjum hava fingið betri møguleikar í sínari vinnu og fara at fáa møguleika at selja ein part av teimum vørum, sum annars høvdu verið keyptar uttanlands.

Landsstýrið leggur tó áherðslu á, at hesar tolllækkingar eisini koma brúkarunum til góðar við niðursettum prísum. Landsstýrið fer at áleggja Prísráðnum at hava eftirlit við, at so verður.

Í § 2 eru ásettar skiftisreglur. Greinin er sett inn fyri at forða fyri, at handlandi ikki skulu koma og biðja um loyvi at útflyta vørurnar við tollafturrindan og síðani flyta tær inn aftur og fáa vørurnar tollaðar við lægra tollinum.

Í 2. stk. eru tað serliga viðurskiftini viðvíkjandi vørusendingum undir tollkreditskipanini, ið kunnu koma illa fyri, tí tær eru eftir reglunum tollskyldugar, tá tær eru uppskipaðar, uttan mun til um tær eru útflýggjaðar. Tí reglan um, at um tær eru komnar til landið, áðrenn lógin er sett í gildi, kunnu tær verða tollaðar eftir nýggju lógini ella tollast umaftur, um tær enn eru á goymslu hjá flutningsfelagnum, herundir postverkinum, ella ikki eru uppakkaðar. Fyri vørur, ið verða tollaðar yvir disk, er tað tollingardagurin, ið er avgerandi.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 7/1991: Broyting í løgtingslóg um innflutningsgjald.

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 20. september 1991 og undir 1. viðgerð tann 23. september 1991 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Føroya Tollstovu.

Undir 1. viðgerð av málinum kom fram, at fleiri løgtingsmenn gingu út frá, at tollur á umrøddu vørubólkum var 33% + 100%, og at landsstýrið í fyriliggjandi uppskoti mælir til at lækka tollin úr 100% niður í ávíkavist 15%, 20%, 25% og 30%, og Tollstovan hevur upplýst fyri nevndini, at í galdandi lóg eru tollsatsirnir 115%, 120%, 125% og 130%, talan er sostatt um at taka 100% burtur.

Annars upplýstu umboðini fyri Føroya Tollstovu, at broytingarnar í uppskoti landsstýrisins eru í samljóð við ta tillaging í toll- og avgjaldsskipanini, sum verður kravd í samband við fríhandilsavtaluna við EF.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Eyðun Videro og Jørgen Niclasen) tekur undir við uppskoti landstýrisins og leggur dent á, at broytingin javnstillar teir borgarar, sum sjálvdan ella ongantíð ferðast í útlondum, við teir, sum ofta eru uttanlands, og í tí sambandi keypa hesar vørubólkar fyri nógv lægri prís enn tann í Føroyum.

Føroya Tollstova hevur gjørt vart við, at villur eru í orðingini í § 2, og verður tí sett fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Sum nýtt 7. pkt. verður sett:

"7) Sum nýggj § 8 b verður sett:
"Hóast § 8 í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum, kunnu vørur, ið fáa tollin niðursettan orsakað av hesari lógarbroyting, ikki fáa tollin endurgoldnan, um vørurnar verða útfluttar.

Stk. 2. Vørur, komnar til landið, men enn ikki tollgreiddar, verða tollaðar eftir hesari lóg. Vørur komnar til landið undir tolldreditskipanini kunnu eisini verða tollaðar eftir hesi reglu, um tær enn eru á goymslu flutningsfelagsins ella ikki eru upppakkaðar.""

§ 3 verður § 2.

Som nyt pkt. 7 tilføjes:

"7) Som ny § 8 b indsættes:
"På trods af § 8 i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer, kan varer, der får toldnedsættelse i henhold til denne lovændring, ikke få tolden refunderet, hvis varerne eksporteres.

Stk. 2. Varer, som er kommet til landet, men endnu ikke toldklareret, skal fortoldes i henhold til denne lov. Varer, som er kommet til landet under toldkreditordningen, kan også fortoldes efter dette princip, hvis de endnu opbevares på transportørens lager eller endnu ikke er udpakket.""

§ 3 bliver § 2.

Við hesi broyting mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) tekur støðu í tingsalinum.

8. Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakfør um.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggja § 2 verður sett:
"Virðisgrundarlagið á motorakførum, ið eru innflutt til sølu í Føroyum, er søluprísurin frá seljara í Føroyum til keypara, froknað at akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og cykaútgerð. Í virðisgrundarlagið inngongur fakturaprísurin, farmagjald, flutningstrygging, innflutningsgjald sambr. løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum, cykainnflutningsgjald sambr. løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979, vørugjald, uppskipan og klárgerð, men ikki froknað vinning hjá

Lagtingslov om ændringer i lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 vedrørende registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1) Som ny § 2 indsættes:
"Værdigrundlaget for motorkøretøjer, som er indført til salg på Færøerne, er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, iberegnet at køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr. I værdigrundlaget indgår fakturapris, fragtafgift, transportforsikring, indførselsafgift jfr. lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer, ekstra indførselsafgift jfr. lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979, vareafgift, losning og klargørelse, men ikke sælgers avance registre-

seljara, skrásetingargjald smbr. § 1, skrásetingarsýn, trygging, vegskattur o.t. í Føroyum."

2) Sum nýggj § 2, 2 stk. verður sett: "Vektgjaldsgrundarlagið er typugóðkenda eginvektin á akfarinum."

3) Sum nýggj § 2, 3. stk. verður sett: "Í førum, har talan ikki er um vanligar søluumstøður, t.d. tá ið seljarin og keyparin er sami persónur, ella tá ið seljarin hevur fíggarligan áhuga í virksemi ella ogn keyparans, kann tollvaldið áseta virðisgrundarlagið, soleiðis, at hetta kemur at fevna um tey gjøld og útreiðslur, ið skulu innganga í virðisgrundarlagið smbr. 1. stk."

4) Sum nýggj § 2, 4. stk. verður sett: "Í førum har motorakfør verða innflutt av privatum, feløgum, ella stovnum, kann tollvaldið áseta, virðisgrundarlagið smbr. 1., 2. og 3. stk."

5) 4, 3. stk. verður orðað soleiðis: "Munurin millum skrásetingargjald av persónvogni og hýruvogni/- skúlavogni verður endurrindaður yvir eitt 3 ára skeið eina ferð árliga."

6) Í § 7. a. verður "Virðisgjald: 13%" broytt til:"virðisgjald: Einki gjald."

7) Í § 7. b. verður "Virðisgjald: yvir 3.500 kg: 13% broytt til: "virðisgjald: einki gjald" og "Vektgjald yvir 3.500 kg: kr. 2 pr. kg." verður broytt til :"Vektgjald: Einki gjald" og Vektagjald 3.500 kg. og undir: kr. 4 pr. kg." verður broytt til : "Vekt-

ringsafgift jfr. § 1, registreringsgebyr, forsikring, vejskat o.l. på Færøerne."

2) Som ny § 2, stk. 2 indsættes: "Vægtafgiftsgrundlaget er den typegodkendte egenvægt på motorkøretøjet."

3) Som ny § 2, stk. 3 indsættes: "I de tilfælde, hvor der ikke er tale om almindelige salgsomstændigheder, f. eks. når sælger og køber er samme person, eller når sælger har økonomisk interesse i købers virksomhed eller ejendom, kan toldvæsenet fastsætte værdigrundlaget, således, at dette omfatter afgifter og omkostninger, som skal indgå i værdigrundlaget jfr. stk. 1."

4) Som ny § 2, stk. 4 indsættes: "I de tilfælde, hvor motorkøretøjer indføres af private, foreninger, eller institutioner, kan toldvæsenet fastsætte værdigrundlaget. jfr. stk. 1, 2 og 3."

5) § 4, stk. 3. affattes således: "Forskellen mellem registreringsafgift af personvogn hyrevogn/ skolevogn tilbagebetales en gang årlig over 3 år."

6) I § 7. a. ændres "Værdiafgift 13%" til: "Værdiafgift: Ingen afgift."

7) I § 7.a. ændres "Værdiafgift over 3.500 kg, 13% til "Værdiafgift: Ingen afgift" og "Vægtafgift over 3.500 kg: kr. 2 pr. kg" ændres til: "Vægtafgift: Ingen afgift", og "Vægtafgift 3.500 kg. og under: kr. 4 pr. kg" ændres til: "Vægtafgift 3.500

gjald 3.600 kg. og undir: kr. 6 pr. kg."

8) § 12 verður orðað soleiðis: "Brúkt motorakfør: Fyri motorakfør, ið hava verið endaliga skrásett í útlondum í minni enn 1 ár, er skrásetingargjaldið 90% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

Stk. 2. hevur motorakfarið verið endaliga skrásett í útlondum í millum 1 og 5 ár, er skrásetingargjaldið 70% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

Stk. 3. Í førum har motorakfarið hevur verið endaliga skrásett í útlondum í meira enn 5 ár, er skrásetingargjaldið 50% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar."

9) Sum nýggj § 12.a. verður sett:
"Landsstýrinum verður heimilað at áseta serligar reglur um skyldu at gjalda skrásetingargjald smbr. hesi lóg, tá ið motorakfør verða uppbygd aftan á ferðsluskaða, slit, tering v.m.

Stk. 2. Skrokknummar má bert verða flutt, broytt, burturbeint ella ísett við tollvaldsins loyvi."

10) Sum nýggj § 12. b. verður sett:
"Fyri veteranakfør, ið verða skrásett, skal einki skrásetingargjald rindast.

Stk. 2. Við veteranakfør smbr. 1. stk. er at skilja motorakfør, ið eru eldri enn 30 ár, og sum framvegis hava sama skap sum upprunaakfarið."

kg og under; kr. 6 pr. kg."

8) § 12 affattes således:
"Brugte motorkøretøjer. For motorkøretøjer, som har været endeligt registreret i udlandet i mindre end 1 år, er registreringsafgiften 90% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj.

Stk. 2. Hvis motorkøretøjet har været endeligt registreret i udlandet i mellem 1 og 5 år, er registreringsafgiften 70% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj.

Stk. 3. I de tilfælde, hvor motorkøretøjet har været endeligt registreret i udlandet i mere end 5 år, er registreringsafgiften 50% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj."

9) Som ny § 12.1, indsættes:
"Landsstyret bemyndiges til at fastsætte særlige regler om forpligtelse at betale registeringsafgift i henhold til denne lov, når motorkøretøjer genopbygges efter færdselsskade, slitage, tæring m.v.

Stk. 2. Stelnummer må kun flyttes, ændres, fjernes eller isættes med toldvæsenets tilladelse."

10) Som ny § 12.b. indsættes:
"Ved registrering af veteranmotorkøretøjer skal ingen afgift erlægges.

Stk. 2. Ved veteranmotorkøretøjer jfr. stk. 1 skal forstås motorkøretøjer, som er ældre end 30 år, og som stadig har samme form som oprindelseskøretøjet."

11) Sum nýggj § 12.e, verður sett:
"Fyri tey í § 9 nevndu motorakførini, ið hava verið endaliga skrásett í minni enn 1 ár, og sum verða seld, er skrásetingargjaldið 90% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

Stk. 2. Hevur motorakfarið verið endaliga skrásett millum 1 og 5 ár, er skrásetingargjaldið 70% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

Stk. 3. Í førum har motorakfarið hevur verið endaliga skrásett í meira enn 5 ár, er skrásetingargjaldið 50% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Akfør, ið verða fráboðað til skrásetingar tann í 1. stk. nevnda dagin og seinni, koma undir hesar reglur.

11) Som ny § 12.e. sættes:
"For de i § 9 nævnte motorkøretøjer, som har været endeligt registreret i mindre end 1 år, og som bliver solgt, er registreringsafgiften 90% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj.

Stk. 2. Hvis motorkøretøjet har været endeligt registreret mellem 1 og 5 år, er registreringsafgiften 70% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj."

Stk. 3. I de tilfælde, hvor motorkøretøjet har været endeligt registreret i mere end 5 år, er registreringsafgiften 50% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Stk. 2. Køretøjer, som bliver angivet til registrering den i stk. 1 nævnte dag og senere, er omfattet af disse bestemmelser.

Viðmerkingar

Uppskot landsstýrisins um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum hevur sum endamál í ein vissan mun, at seta gongd á aftur bilsøluna, ið síðan 1987, tá ið skrásetingin av motorakførum var tann mesta nakrantíð, hevur verið minkandi í slíkan mun, at landsstýrið metir, at talið av nýskrásetingum er í minna lagi.

Á niðanfyri standandi talvu er eitt yvirskrásett akfør í Føroyum í tíðarskeiðnum 1985-1990.

Ár	Tal av skrásettum motorakførum
1985	1761
1986	2417
1987	2710
1988	2505
1989	1359
1990	509

Higartil í ár eru skrásett 380 motorakfør.

Tað kunnu verða nógvar orsøkir til, at talið av skrásetingum er fallið so nógv tey seinastu árini. Ein orsøk, ið hevur verið umrødd nógv í seinasturi er, at skrásetingargjaldið hevur verið ov høgt sammett við londini rundan um okkum.

Eftir teimum upplýsingum landsstýrið hevur, er hetta ikki rætt. Tað vil tó altíð verða torført at samanbera skrásetingargjaldið við grannalond okkara, av teirri orsøk, at lóggávan, ið hevur ávirkan á virðisgrundarlagið í hesum londum, er øðrvísi. Uppskot landsstýrisins hevur við sær, at vektgjaldsgrundarlagið verður umlagt frá at vera grundað á typugóðkendu totalvektina á akfarinum, til at vera typugóðkenda eginvektin á akfarinum. Talið á skrásettum persónsakførum í 1990 var 427, t.v.s. at út frá viðmerkingunum til § 1.2. sæst, at missur landskassans hevði verið stórliga kr. 4 mill. Meðalgjaldið fyri eitt persónsakfar lækkar við ein sindur meira enn kr. 10.000, við núgaldandi skrásetingargjaldsupphæddum talar eingi fyri, at talið av nýskrásetingum í 1991 verður hægri enn í 1990.

Landsstýrið fer at endurskoða lógina um skráseting av motorakførum í samband við umleggingina til merivirðisgjaldsskipan 1. januar 1993.

Fyri at vinna aftur inntøkumissin í skrásetingargjaldinum, skulu skrásetast uml. 100 bilar eyka um árið.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

Til 1) Henda § fevnir um tað vanligu gongdina við sølu av akførum í Føroyum, t.v.s. at akfarið verður innflutt beinleiðis av seljaranum, ið síðani selur tað.

Her verður tilskilað at innflutningsgjald og eykainnflutningsgjald altíð skal roknast til virðisgrundarlagið. Tað eru GATT-reglurnar, ið eftir hesum lógum eru avgerandi fyri gjaldsskyldugu virðið við innflutning av akførum.

Til 2) Hetta er mest avgerandi broytingin í lógaruppskotinum. Vektagjaldsgrundarlagið verður broytt frá typugóðkendu totalvektini til typugóðkendu eginvektina á akfarinum.

Á niðanfyri standandi yvirliti sæst munurin í vektgjaldinum við hesari umlegging.

TOTALVEKT	MUNUR	EGINVEKT
1175 kg. á 21,- = 24.675	700 kg. á 21, = 17.700	9.775
1225 - - 21,- = 25.725	775 - - 21, - = 16.275	9.450
1300 - - 21, - = 27.300	825 - - 21, - = 17.325	9.975
1450 - - 21, - = 30.450	900 - - 21, - = 18.900	11.550
1575 - - 21, - = 33.075	1075 - - 21, - = 10.500	10.500
1675 - - 21, - = 25.175	1100 - - 21, - = 23.100	23.075

Tað, at vektgjaldsgrundarlagið verður broytt frá totalvekt til eginvekt umleið kr. 10.000 lægri í meðal fyri hvørt akfar.

Til 3) Talan er um eina nýggja §. § verður nýtt, tá ið virðisgrundarlagið á ymsar hættir kann gerast óveruliga lágt, eitt nú á tann hátt, at seljarin selur akførini til dótturfeløg fyri ein lágan prís. Í førum har dótturfelagið síðani selur akfarið víðari til brúkaran, er virðisgrundarlagið søluprísurin frá dótturfelagnum til brúkaran, av tí at virðisgrundarlagið samb. lógini er søluprísurin frá seljara í Føroyum til keypara.

§ verður bert at nýta, tá ið Tollvaldið metir, at talan er um miðvísa misnýtslu. Í hesum førum má Tollvaldið kanna allar umstøður í sakini. Søla frá trotabúgvi vil ikki í sær sjálvum merkja, at Tollvaldið kann gera brúk av hesari reglu. Avgerandi vil í sovorðnum føri millum annað verða, um søla frá trotabúðnum er gjørd í kapping við aðrar keyparar, og um akførini eru seld til tann, ið hevur hægsta boð. Ein regla um, at søla frá trotabúgvi í sær sjálvum hevði við sær, at tað ikki var talan um vanligar søluumstøður, vildi gjørt tað sera trupult fyri ikki at siga ómøguligt at avtaka eitt trotabúgv við akførum, ið t.d. vóru eldri enn eitt ávíst áratal.

Til 5) Nógaldandi regla er, at munurin á skrásetingargjaldinum av persónvogni og hýru/skúlavogni verður endurrindaður yvir eitt 2 ára skeið eina ferð árliga. Samstundis er ein regla, ið sigur at verða hesi akfør skrásett til persónvogn, áðrenn 3 ár (36 mðr), verður gjaldið afturrindað landskassanum svarandi til tíðina, sum restar í teimum 36 mánaðunum.

Skipanin er sera trupul at fyrisita, og tí er uppskot landsstýrisins, at samsvar verður millum hesar reglur. Landsstýrið arbeiðir tó við broyting í hýruvognsskipanini, og er ætlanin tí, at uppskotið bert skal vera fyribils.

Til 6) og 7) Virðisgjaldið fyri dragivognar (traktorar) til leguvognar er 13%. Hesir gjalda einki vektgjald.

Uppskot landsstýrisins er, at virðisgjaldið verður strikað. Last og vøruvognar, dumparar og leguvognar gjalda bæði virðis- og vektgjald.

Uppskot landsstýrisins er, at hesi gjøld verða strikað fyri hesi akfør yvir 3.500 kg. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst, at tað er lítil og eingin innflutningur av

lastbilum, og at tað í samband við eina nýggja toll- og avgjaldslóggávu verður ein meginregla, at avgjald ikki er á vinnutólum. Dømi er um, at føroyskir lastbilaeigarar ikki kunnu kappast við útlendskar lastbilaeigarar um flutning av føroyskum vørum á meginlandinum, millum annað orsakað av føroysku tolllógini. Vektgjaldið á akførum 3.500 kg og undir verður broytt til 6 kr. pr. kg. orsakað av broyting til eginvekt sum grundarlag.

Til 8) § fevnir um brúkt motorakfør.

Skrásetingargjaldið fyri hesi akfør er 90% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar. Hetta tykist í nógvum førum at vera órímuligt.

Uppskot landsstýrisins er tí, at núgaldandi reglur bert verða galdandi fyri motorakfør, ið hava verið endaliga skrásett í útlondum í minni enn eitt ár.

Hevur akfarið verið endaliga skrásett í útlondum millum eitt og fimm ár, verður skrásetingargjaldið 70% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

Hevur akfarið verið endaliga skrásett í útlondum í meira enn 5 ár, verður skrásetingargjaldið 50% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

Til 9) Talan er um eina nýggja §. Higartil hevur skrásetingargjald ikki verið goldið, tá ið motorakfør eru uppbygd aftan á ferðsluskaða, slit, tering v.m. Spurningurin hevur t.d. verið, um Tollvaldið kann krevja, at skrásetingargjald skal rindast av einum akfari, sum tryggingarfeløg hava mett sum totalskadd, og sum verða uppbygd og síðani tikin í nýtslu.

Eisini hevur verið ivasamt, um Tollvaldið kann krevja skrásetingargjald av skrokkum, ið eru komnir til landið, og sum síðani eru uppbygdir.

§ er gjørd fyri at geva Tollvaldinum heimild at krevja skrásetingargjald í slíkum førum. Ætlan landsstýrisins er at áseta nærri reglur í kunngerð um, nær ið talan er um uppbygging.

Í § 7, 2. stk. er ásett, at skrokknummmar bert má flytast, broytast, burturbeinast ella ísetast við Tollvaldsins loyvi. Hetta er gjørt fyri at hava eftirlit við teimum í 1. stk. nevndu akførum.

Til 10) § er nýggj og fevnir um veterambilar. Tað eru motorakfør, ið eru eldri enn 30 ár. Fyri hesi akfør skal einki skrásetingargjald rindast.

Til 11) Tey í § 9 nevndu akførini gjalda einki skrásetingargjald við nýskráseting, og eingin lógarheimild hevur verið fyri at krevja skrásetingargjald, tá ið hesi seinni verða seld privatum. Uppskot landsstýrisins er, at tá ið hesi akfør verða seld, skal skrásetingargjald rindast í mun til, hvussu gamalt akfarið er.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 8/1991: Broyting í løgtingslóg um skrisetingargjald á motorakførum v.m.

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 20. september 1991 og eftir 1. viðgerð tann 23. september beint í Skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Føroya Tollstovu, við umboð hjá felagnum hjá bilseljarum og við umboð fyri Ráðið fyri ferðslurygd.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Eyðun Videro og Jørgen Niclasen) førir fram, at tann stóra broytingin í uppskoti landsstýrisins er, at farið verður frá totalvekt yvir til eginvekt, tá vektgjaldið verður úthroknað. Við óbroyttum vektgjaldi merkir hetta, at akførini gerast í meðal 10.000 kr. bíligari enn nú. Meirilutin er vitandi um, at flestu lond rokna vektgjaldið av eginvektini, og kann tí taka undir við, at henda broyting verður framd.

Á fundinum við Ráðið fyri Ferðslutrygd kom fram, at ymisk trygdarútgerð so sum ABS-bremsur, trygdarútgerð til børn, fyrstahjálparskjátur, súkklustólar, súkkluhjálmar og endurskin úr plastikk koma undir 33%, tá hesi verða flutt inn sum eykahlutir, meðan somu lutir, tá teir verða innfluttir sum partar av einum akfari, koma undir nógv hægri tollgjøld (220%).

Meirilutin heldur, at ávís mótvirði átti at verið givin, tá tílík trygdarútgerð verður innflutt sum partur av einum motorakfari. Meirilutin er av teirri áskoðan, at landsstýrið átti at tikið hendan spurning upp við tí fyri eyga at leggja serligt uppskot fyri tingið um at veita mótvirði fyri slíka útgerð, tá hon verður flutt inn í landið sum partur av motorakfari.

Meirilutin hevur eisini viðgjørt spurningin um serligar reglur um uppbygging av bilum í Føroyum og hevur ráðført seg við persón, sum hevur fingist við hetta arbeiðið.

Meirilutin er ikki heilt nøgdur við tær reglur, sum landsstýrið hevur skotið upp undir pkt. 8 og mælir til, at landsstýrið endurskoðar hesar reglur og leggur uppskot um hetta fyri tingið seinni í tingsetuni.

Meirilutin mælir til, at § 8 í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verður orðað soleiðis:

§ 8.

Avlamisvognar, virðisgjald einki gjald. Hetta merkir, at virðisgjaldið, sum í dag er 20%, feltur burtur. Meirilutin heldur, at rørslubrekað í flestu førum hava størri tørv á størri motorakførum enn tey, sum hava fullan førleika. Út frá hesum heldur

meirilutin eisini, at tann siðvenja, sum Hjálpitólamiðstøðin og Almannastovan nýta í sambandi við játtan av láni og stuðuli til avlamisvognar, er heilt burturvið.

Meirilutanum kunnugt, kann Almannastovan veita upp til 30.000 kr. í láni og upp til 30.000 kr. í stuðuli til avlamisvognar. Í førum, har bilarnir fara upp um ávísan kostnað, verður hvørki lán ella stuðul játtað. Hetta heldur meirilutin vera skeivt, tí tað er hin avlamni sjálvur, sum rindar tær seinastu krónurnar.

Meirilutin mælir til av tekniskum orsøkum at gera fylgjandi broytingar:

1) Í § 1, pkt. 1 verður orðingin: "ið eru innflutt til sølu í Føroyum strikað".
2) Í § 1. pkt. 8, í § 12 verða 2. og 3. stk. broytt og
3) § 1 pkt. 11 verða § 12 c, 2. og 3. stk. broytt, og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, pkt. 1, verða orðini" , ið eru innflutt til sølu í Føroyum," strikað.	**1)** I § 1, pkt. 1, udgår ordene ",som er indført til salg på Færøerne,"
2) Í § 1, pkt. 8, gongur út orðið: "í millum" og í staðin verður sett: "úr 1 upp til 5 ár" ogí stk. 3 í sama pkt. ganga út orðini: "meira enn" og í staðin verður sett "ella meiri".	**2)** (Eingin broyting.)
3) Í § 1, pkt. 11 verða í § 12 c, 2. stk. verður sett aftaná "1 og": "upp til".	**3)** I § 1, pkt. 8 udgår ordet: "mellem" og efter "1 og" indsættes: "op til".
4) Í § 1, pkt. 11, stk. 3 ganga út orðini "í meira enn" og í staðin verður setta aftaná "5 ár": "ella meiri".	**4)** (Eingin broyting).

Umframt hetta broytingaruppskot setir meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í § 8 verða "20%" broytt til: "Eitki gjald".	I § 8 ændres "20%" til: "Ingen afgift".

Umframt førir Vilhelm Johannesen fram, at hann í fyrstu syftu ikki kann taka undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at vinningurin hjá seljaranum verður tikin við í virðisgrundarlagið og setir tí fram samsvarandi broytingaruppskot.

Broytingaruppskot

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 2 verður sett:
"Virðisgrundarlagið á motorakførum er søluprísurin frá seljara í Føroyum til keypara íroknað, at akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og cykaútgerð. Í virðisgrundarlagið inngongur fakturaprísurin, farmagjald, flutningstrygging, innflutningsgjald sbrt. løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum, eykaflutningsgjald sbrt. løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979, vørugjald, uppskipan, klárgerð og vinningur hjá seljara, men ikki skrásetingargjald sbrt. § 1, skrásetingarsýn, trygging, vegskattur o.t. í Føroyum."

I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1) Som ny § 2 indsættes:
"Værdigrundlaget for motorkøretøjer er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, iberegnet at køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr. I fakturapris, fragtafgift, transportforsikring, indførselsafgift jfr. lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer, ekstra indførselsafgift jfr. lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979, vareafgift, losning, klargørelse, og sælgers avance, men ikke registreringsafgift jfr. § 1, registreringsgebyr, forsikring, vejskat o.l. på Færøerne."

Vilhelm Johannesen vísir á, at virðisgrundarlagið umfatar fakturaprís, farmagjald, flutningstrygging, innflutningsgjald smbr. løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum, eykainnflutningsgjald smbr. løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979, vørugjald, uppskipan og klárgerð, men ikki vinningin hjá seljaranum.

Eisini vísir Vilhelm Johannesen á, at føroyskir bilaseljarar taka órímilga høgan vinning, í mun til tann vinning, sum bilaseljarar í okkara grannalondum taka. Um vinningurin hjá seljaranum verður tikin við í virðisgrundalagið, so verður seljarin sjálvur við til at áseta skrásetingargjaldið, sum umfatar virðisgjald og vektgjald.

Tekur seljarin órimiliga høgan vinning, verður virðisgjaldið, og harvið eisini skrásetingargjaldið, órímuliga høgt. Um seljarin hinvegin heldur vinninginum á einum rímuligum støði, verður virðisgjaldið og harvið skrásetingargjaldið harefter.

Í verandi skipan er møguleiki eisini fyri at sleppa sær undan tí veruliga ætlaða virðisgjaldinum. Bilaseljari kann innflyta ein nýggjan bilskrokk. Í slíkum føri gongur fakturaprísurin á bilskrokkinum, og ikki tann tidni bilurin, inn í virðisgrundarlagið.

Restin, sum verður sett á bilin aftaná, verður innflutt sum eykalutir, og koma hesir bara undir serliga innflutningsgjaldið og eykainnflutningsgjaldið, sum tilsamans eru 33%. Um vinningurin gongur inn í virðisgrundarlagið, verður hesin møguleikin útilokaður. Vilhelm Johannesen heldur tað vera skeivt, at lógin skal loyva hesum møguleika.

Í løgtingsmáli nr. 98/90 melti landsstýrið til at lækka skrásetingargjaldið á motorakførum. Málið vann ikki fruma á tingi tá, m.a. tí at hann ikki tók undir við uppskotinum, sum restaði tvær atkvøður í at verða samtykt. Grundgevingin fyri uppskotinum var sum kunnugt at útvega landskassanum fleiri inntøkur.

Einaferð í summar glapp av munni landsstýrismansins, at ein av orsøkunum til tær svikaligu tollinntøkurnar hjá landskassanum var, at uppskot landsstýrisins um at lækka skrásetingargjaldið á motorakførum, ikki varð samtykt. Í hesum orðum lá ein ávís skuldseting móti undirritaða.

Vilhelm Johannesen heldur ikki, at vit hava nakran tørv á øktum innflutningi av bilum, men hinvegin trýr minnilutin heldur ikki, at ein lækking í bilaprísinum upp á í meðal 10.000 kr. førir til nakran nevniverdan vøkstur í innflutninginum og søluni av nýggjum bilum.

Fyri at prógva, at meting hansara er bein, vil Vilhelm Johannesen tí í aðru syftu atkvøða fyri landsstýrisuppskotinum við teirri broyting, sum ein meiriluti í skattanevndini hevur sett fram.

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Lasse Klein) kemur við ískoytisáliti, sum verður framlagt, tá málið kemur til 2. viðgerð.

9. Broytingar í løgtingslóg um eydnuspæl v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 1987 um eydnuspæl v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 2 verður skoytt uppí:
"Tó kann útgevarin av einum blaði ella tíðarriti, ið kemur út regluliga, skipa fyri eydnuspæli til útflýggjan av vinningum í virðisløn arkapping-um."

2) Í § 4 verður skoytt uppí sum nýtt stk. 4:
"**Stk. 4.** Eftir nærri ásettum treytum kann veitast felagum o.l., sum lúka treytirnar í § 3, standandi loyvi til í upp til 1 ár um ferðina at fyrireika eydnuspæl, um so er, at teir einstøku vinningarnir ikki fara upp um 3.000 kr.

§ 1.

I lotterispil m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 2. stk. 2 tilføjes:
"Udgiveren af en avis eller et tidsskrift, der udkommer regelmæssigt, kan foranstalte lodtrækning til fordeling af gevinster i forbindelse med løsning af præmiekonkurrencer."

2) I § 4 tilføjes som nyt stk. 4:
"**Stk. 4.** På nærmere fastsatte vilkår kan der meddeles foreninger o.l., der opfylder betingelserne i § 3, stående tilladelse til i op til 1 år ad gangen at foranstalte lotterispil, på betingelse af, at de enkelte gevinster ikke overstiger 3.000 kr."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Eftir § 2, stk. 2 í løgtingslógini um eydnuspæl er ikki loyvt vinnurekandi at útflýggja vinningar eftir eini skipan, sum er heilt ella partvís tilvildarlig.

Hetta merkir m.a., at alt eydnuspæl í føroyskum bløðum er bannað, t.d. bingo ella vinningar fyri loysn av krossorðagátum. Henda lóggáva kann tykjast órímilig, tá sæð verður, hvussu nógv útlendsk viku-, dag- og krossorðagátublað koma til landið, uttan at nakað kann gerast við hetta.

Skotið er tí upp at broyta eydnuspælslógina soleiðis, at vikið kann verða frá forboðnum hjá vinnurekandi at útflýggja vinningar. ið útgevarar av bløðum og tíðarritum útflýggja í samband við virðisløn arkappingar.

Við løgtingslóg nr. 8 frá 16. januar 1990 varð løgtingslóg nr. 11. frá 9. apríl 1968 um gjald av vinningum broytt, soleiðis at gjald ikki longur skuldi latast av vinningum undir 3.000 kr. Upphæddin var frammanundan 500 kr. Hetta varð gjørt fyri at lætta um fyrisitingina av lógini. Fyri eisini at lætta fyrisitingina av eydnuspælslógini er skotið upp, at veitast kann feløgum o.fl., sum lúka vanligu treytirnar fyri at fáa loyvi til eydnuspæl, um teir einstøku vinningarnir ikki fara upp um 3.000 kr.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 9/1991: Broyting í løgtingslóg um eydnuspæl o.a.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. september 1991 og undir 1. viðgerð 23. september 1991 beint í rættarnevndina.

Sambært galdandi lóggávu er ikki loyvt vinnurekandi at útflýggja vinningar eftir eini skipan, sum er heilt ella partvís tilvildarlig. Hetta merkir, sum landsstýrið sigur í viðmerkingunum sínum, at eydnuspæl í føroyskum bløðum er bannað. Hetta at føroyskum bløðum er bannað at hava bingo ella útflýggja vinningar fyri loysn av krossorðagátum tykist órímiligt, tá hugsað verður um, at hópur av útlendskum viku-, dag- og krossorðagátubløðum koma til landið, samstundis sum hesi bjóða út vinningar, uttan at nakað kann gerast við hetta.

Landsstýrið skjýtur tí upp at broyta lógina um eydnuspæl soleiðis, at vikið kann verða frá forboðnum í galdandi lóggávu sett vinnurekandi at útflýggja vinningar, ið útgevarar av bløðum og tíðarritum útflýggja í samband við virðisløn arkappingar.

Fyri at lætta um fyrisitingina av eydnuspælslógini, mælir landsstýrið til, at veitast kann feløgum o.fl., sum lúka vanligu treytirnar fyri loyvi til eydnuspæl, at fáa standandi loyvi í upp til eitt ár um ferðina, til eydnuspæl, um teir einstøku vinningarnir ikki fara upp um 3.000 kr.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin(Jóannes Dalsgaard, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm) mælir løgtingingum til at taka undir við málinum.

Ein minnilutin (Lisbeth L. Petersen) tekur ikki undir við meirilutanum. Víst verður til viðmerkingar landssstýrisins, har tað verður sagt, at tað er órímiligt, at vinnurekandi í Føroyum ikki er loyvt at útflýggja vinningar í samband við bingo ella loysn av krossorðagátum, tá útlendsk viku-, dag- og krossorðagátublø koma til landið, uttan at nakað kann gerast við hetta.

Ásannast má, at m.a. føroysk krossordagáttaútgáva stimbrar føroyska málið, og á tí økinum er uppskot landsstýrisins heppið, men tá talan er um bingo, er stoðan ein onnur. At hava bingo í felagsskapum og samkomum við ávisum og ofta vælgerandi endamáli fyri eyga er rímiligt. Hinvegin er tað órímligt, at føroysk blað, ið ofta eru heft at politiskum flokki, ið fær almennan pening til politiska upp-lýsing, fáa loyvi at hava bingo, tá ið hetta kann geva aðrum nevndu felagsskapum og samkomum óneyðuga kapping.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri tingið uppskot um broytingar í løgtingslóg um eydnuspæl, har loyvi verður givið útgevarum av blaðum og tíðarritum at úrflýggja smærri vinningar í sambandi við loysn av krossordagátum o.l.

Ein annar minniluti (Signar Hansen) fortir fram:

Vísandi til, at marknaðurin fyri innsavning av peningi til frítíðarendamál hjá ítróttarfeløgum, ungmannafeløgum, pensiónistafelogum og øðrum áhugafelogum gerst alsamt trongri, og minni og minni verður í part, so verður tað hildið vera órímligt, um so er, at politisk blað, sum gjøgnum politiskar flokkar sínar fáa teirra ríkiligu lut í skattapeningi borgarans til politiska upplýsing, eisini fara í beinleiðis kapping við frítíðarfeløgini og tráðroyna einastu peningakeldur teirra við heilt ella partvís tilvildarligum kappingum, sum t.d. bingokappingum. Tí verður hendan broyting skotin upp, um so er, at pkt. 1. í broytingaruppskoti landsstýrisins verður samtykt. Sostatt setur minnilutin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

Í § 2, stk. 2, verður skoytt uppí:

"Hetta er tó ikki galdandi fyri tey dagbløðini, sum reka partapolitiska skriving fyri flokkamar á tingi."

I § 2, stk. 2 tilføjes:

"Denne bestemmelse gælder dog ikke for de aviser, som fører partipolitisk journalistik for partierne pa lagtinget.

10. Keyp av fyrisitingar-bygningi í Klaksvík

Uppskot

til

Løgtingslóg um keyp av fyrisitingar-bygningi í Klakvík

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at keypa bygningin matr. nr. 1133a í Klaksvík fyri 4 mió. kr. og at rinda peningin úr landskassanum.

§ 2.

Landsstýrinum verður heimilað at nýta upp til 1 mió. kr. til umbygging og at rinda peningin úr landskassanum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir. at hon kunngjørd.

Lagtingslov om køb af administrations-bygning i Klaksvík.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at købe bygningen matr. nr. 1133a i Klaksvík for 4 mio. kr. og at betale af landskassen.

§ 2.

Landsstyret bemyndiges til at anvende op til 1 mio. kr. til ombygning og at betale af landskassen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Landsstýrið hevur síðan 1986 leigað partar av húsunum hjá Jákup Eli Steffensen í Klaksvík til Líkningarráðið í Klaksvík. Mánaðarliga leigan er í løtuni 11.475 kr. Leigumálið er sagt upp og fer úr gildi 1. november í ár, og Líkningarráðið hevur einki annað høli at fara í. Orsøkin til at leigumálið er sagt upp er, at J. E. Steffensen er ónøgdur við leiguna hann fær. Um Líkningarráðið skal flyta, kemur tað at kosta umleið 100.000 kr. - bert at flyta EDV- útgerðina.

Harumframt leigar Vaktar- og Bjargingartænastan 220 m² í kjallaranum fyri umleið 10.000 kr. um mánaðin. Hesin leigusáttmáli er óuppsagdur, men kann sigast upp við 6 mánaða ávaring.

Í samráð við nýggju uppsskipanina hevur talan verði um at leggja toll- og skattadeildir saman.

Høllisviðurskiftini hjá Tollstovuni í Klaksvík eru í løtuni sera vánalig. Tollstovan leigar í dag ein kjallara uppá 70m².

Tað hevur verið uppá tal, at Tollstovan skuldi leiga frá J. E. Steffensen, og hevur stovnurin fingið pening til hetta á inniverandi fíggjarlóg.

Sum er rindar landsstýrið góðar 21.000 kr. í leigu - um Tollstovan eisini leigaði í húsunum, hevði leiguinntøkan verið umleið 33.000 kr. um mánaðin, ella umleið 400.000 kr. árliga.

Bygningurin liggur út til høvuðsveg og nær við havnina - við góðum parkeringsviðurskiftum. Grundøkið er 847 m², harav 74 m² er parkeringspláss. Bygningurin er innrættaður sum handils- og skrivstovubygningur í trimum hæddum. tilsamans 3x 220 m² = 660 m².

Ovasta hæddin er innrættað til Líkningarráðið, Miðhæddin hevur verið útleigað til handil. Har er eitt stórt høli, skrivstova, 2 WC og trappa til 1. hædd.

Kjallarin er innrættaður til Vaktar- og Bjargingartænastuna. Tað er einans miðhæddin, ið verður kostnaðarmikil at innrætta. Samhæri Arkitekt og Verkfrøði P/F Tróndur Fuglø umleið 1 mió. kr.

Landsstýrið hevur tingast við J. E. Steffensen um prís fyri bygningin, og J. E. Steffensen hevur góðkent ein prís uppá 4 mió. kr. Hesin prísur má sigast vera sera rímiligur, eisini í mun til árligu húsaleiguna.

Prísurin kann býtast soleiðis:

Grundøki	847 m²	á	500 kr. =	423.500 kr.
Bygningur	660 m²	á	5.410 kr. =	3.576.540 kr.
				4.000.040 kr.
avrundað til				4.000.000 kr.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 10/1991: Keyp av fyrisitingarbygningi í Klaksvík.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. september 1991 og undir 1. viðgerð 25. september 1991 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Flemming Mikkelsen) og minnilutin (Finnbogi Ísakson) taka støðu í tingsalinum.

11. Lán til fígging fyri alivinnuna

Uppskot

til

Løgtingslóg um lán til fígging fyri alivinnuna.

Lagtingslov om finansiering for opdræt af fisk.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán uttanlands upp til 200 mió. kr. til lánsgrunn fyri alivinnuna.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån udenlands op til 200 mio. kr. til lånefond for opdræt af fisk.

§ 2.

Landsstýrið ger reglur og kunngerð um, hvussu hesin peningur verður lentur virkjum innan alivinnuna, og hvussu peningurin verður afturgoldin landskassanum.

§ 2.

Landsstyret gør regler og kundgørelse for, hvordan disse penge bliver lånt ud til virksomheder inden for opdræt, og hvordan lånene bliver tilbagebetalt landskassen.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Løgmaður vísti í ólavsøkuroðu sini á, at longu nú kemur fimta hvør útflutningskróna frá alivinnuni. 12.000 tons av alifiski vóru í 1990 útflutt fyri 500 mió. kr., og fyri 1992 er roknað við, at 20.000 tons av alifiski verða útflutt, um rætt verður farið fram, til eitt virði upp á meira enn 700 mió. kr.

Væl av fólki fær úrtøku sína úr alivinnuni, og tað ber til at gera uppaftur fleiri arbeiðsplúss, um vinnan fær møguleikar at menna seg.

Alivinnan hevur í longri tíð havt stórar trupulleikar við fígging, og menn tykjast á einum máli um, at nú slepst ikki undan hjá tí almenna at gera nakað munagott, um alivinnan ikki skal kollsigla.

Alivinnan fær sum er ongan studning úr landskassanum, og tað er heldur ikki hugsanin, at so skal vera, men skotið verður upp, at fígging verður útvegað vinnu

ni, sum hon hevur so harðliga fyri neyðini, tí at alivinnan krevur bæði stórar íløgur og stóran rakstrarkapital.

Tá ið broyting í løgtingslógini um aling av fiski v.m. á vári 1990 var til viðgerðar á tingi, setti limurin hjá Kristiliga Fólkaflokkingum í fiskivinnunevndini fram uppskot um at áleggja landsstýrinum at finna fram til eina fígging av alivinnuni, sum kann økja um framleiðsluna og hækka samlaða útflutningsvirðið. Hugsað er um ein lánsgrunn, ið kann veita virkjum í alivinnuni lán móti t.d. 1. prioriteti, sum tryggjar, at landskassin fær allan pening sín aftur.

Lánið, sum skotið verður upp at taka uttanlands, er eitt íløgulán, sum ikki økir um nýtsluna, men sum eftir stuttari tíð økir um framleiðsluna og útflutningin og skapar nógv nýggj arbeiðspláss. Tað er tann vegin, vit skulu ganga, um sleppast skal burtur úr arbeiðsloysinum og fíggjartrupulleikunum hjá bæði borgarum og landskassanum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 11/1991: Lán til fígging fyri alivinnuna.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 30. september 1991 og undir 1. viðgerð 3. oktober 1991 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) ásannar, at alivinnan hevur fyri neyðini, at nakað verður gjørt við trupulleikarnar í stundini.

Undir viðgerðini av fíggjarlógini hevði nevndin fundir við peningastovnar og umboð fyri alivinnuna.

Meirilutin heldur seg hava fingið at vita, at trupulleikarnir hjá alivinnuni ikki verða loystir, hóast at landskassin lænir pening at læna út aftur til alivinnuna.

Annars verður víst á álitið til fíggjarlógina fyri 1992, har meirilutin í Fíggjarnevndini vísir á ein møguleika at stimbra alivinnuna.

Víst verður á, at bæði undanfarna og sitandi landsstýri hava arbeitt við hesum máli. Meirilutin kann tí ikki taka undir við uppskotinum og setir fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum skjótast gjørligt, helst beinanvegin, saman við vinnuni og lánistovnunum at finna eina fíggjarliga loysn í hesum álvarsmáli.

Ein minniluti (Finnbogi Arge og Flemming Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið hjá Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki um at veita landsstýrinum heimild til at taka lán uttanlands upp á 200 mió. kr. til lánsgrunn til alivinnuna stríðir ímóti samtykt løgtingsins av løgtingsmáli nr. 39/1991, sum staðfestir, at landskassin bert hevur heimild til at taka upp lán til endamál, sum standa á fíggjarlógini.

Upprunaliga vóru 60 alistøðir í Føroyum, men av teimum eru 8 niðurlagdar, allar í Sundalagnum ella á Skálafjørðinum. Av teimum 52 alistøðunum, sum eftir eru, hava 14 skift eigara, og 9 eru undir bankafyrisiting. Serfrøðingar meta, at bert 16 støðir svara hvørjum sítt. Sostatt eru bert 27% av upprunastøðunum í rentablum rakstri.

Sostatt er farin og fer framvegis ein ógvuslig sanering fram innan alivinnuna. Minnilutin heldur, at vinnan skal greiða sínar trupulleikar sjálv saman við privatu bankunum. Tað almenna kann taka burtur órímilig avgjøld, sum eru á vinnuni, men tað kann undir ongum umstøðum koma up á tal, at landskassin fer at virka sum banki hjá vinnulívinum. Vit stríðast við at fáa tað almenna burturúr høvuðsvinnuni, og í hesum samanhangi tykist uppskotið hjá Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki at vera sera illa umhugsað. Tað almenna luttekur í alivinnuni gjøgnum Ídnaðar- og Menningargrunnin, sum báðir hava mist nógvan pening upp á alivinnuna. Minnilutin heldur, at teir almennu grunnarnir eiga at kunngerða hvussu nógvan pening, teir hava mist ella eru um at missa upp á alivinnuna.

Minnilutin mælir løgtinginunum frá at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Finnbogi Ísakson) ger vart við, at undir viðgerðini av fíggjarlógini fyri 1992 fekst ein greið ábending um, at um landskassin lænir t. d. 200 mió. kr. og veitir hesa upphæddi sum rakstrarlán til alivinnuna, fara teir privatu peningsstovnarnir at halda somu upphæddi aftur í sínari lánveiting.

Tað einasta, sum hetta uppskotið sostatt kann hava við sær, er, at landskassin yvirtekur ein part av teirri lánveiting, sum teir privatu fíggjarstovnarnir annars veita.

Samstundis verður gjørt vart við, at Tjóðveldisflokkurin hevur gingið á odda í arbeiðinum fey seinastu árini at fáa greiðari skilnað millum landskassan og vinnulívið. Fyriliggjandi uppskot ber á øvugla borið, og minnilutin kann tí ikki mæla tinginum til at samtykkja uppskotið.

12. Norðurlendskur millumlanda-sáttmáli um fólkaskráseting

Uppskot

til

samtykar

Landsstýrið boðar donsku stjórnini frá, at heimastýrið góðkennir, at millumlandasáttmáli frá 8. mai 1989 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki um fólkaskráseting verður settur í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar

Innanríkismálaráðið hevur um ríkisumboðsmannin spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at norðurlendskur millumlandasáttmáli um fólkaskráseting, ið var undirskrivaður í Reykjavík 8. mai 1989 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøriki, verður settur í gildi fyri Føroyar.

Tann 15. september 1989 góðkendi Danmark sáttmálan, ið hevur fingið gildi fyri Danmark 1. oktober 1990. Eftir § 7 í sáttmálanum fær sáttmálin ikki gildi fyri Føroyar fyrrenn fyrstkomandi 1. januar, 1. apríl, 1. juli ella 1. oktober, 3 mánaðar eftir at danska stjórnin hevur boðað norska uttanríkismálaráðnum frá, at treytirnar fyri hesum eru loknar, tvs. tá ið landsstýrið hevur boðað donsku stjórnini frá, at sáttmálin eisini skal hava gildi fyri Føroyar.

Sáttmálin, ið avloysir tilsvarandi sáttmála frá 1968, og sum eisini hevði gildi fyri Føroyar, snýr seg um skilti av flytipappírum (internordisk flytipappír), tá ið persónur, ið er skrásettur sum búsitandi í einum norðurlandi, flytur ella er fluttur til eitt annað norðurland. Sáttmálin hevur til endamáls at samskipa reglurnar í norðurlondum um flyting, fastan bústað og fyribils tilhald.

Av nýggjum reglum hevur hesin sáttmáli til endamáls at samskipa reglurnar í norðurlondum um flyting, fastan bústað og fyribils tilhald.

Av nýggjum reglum í hesum sáttmálanum kann nevnast, at tilhald undir 6 mánaðar vanliga ikki verður roknað sum flyting sbrt. § 1 í sáttmálanum. Eftir sáttmálanum frá 1968 var tíðaravmarkað tilhald undir 3 mánaðir ikki roknað sum flyting.

Sáttmálin hevur verið til ummælis hjá Landsfólkayvirlitinum, ið hevur mælt til at góðkenna sáttmálan.

Tað er ikki neyðugt at broyta verandi lóg um fólkayvirlit, løgtingslóg nr. 86 frá 1. juni 1982, fyri at fremja sáttmálan eftir føroyskum rætti. Tær broytingar, ið

krevjast, kunnu gerast fyrisitingarliga. Sum skjal. verður hjálagt "Bekendtgørelse af aftale af 8. maj 1989 med Finland, Island, Norge og Sverige om Folkeregistrering."

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 12/1990: Norðurlendskur millumlandasáttmáli um fólkaskráseting.

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 30. september 1991 og varð við 1. viðgerð tann 3. oktober 1991 beint í rættarnevndina.

Í málinum skjýtur landsstýrið upp, at landsstýrið skal boða donsku stjórnini frá, at heimastýrið góðkennir, at millumlandasáttmáli frá 8. mai 1989 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Sverriki um fólkaskráseting verður settur í gildi fyri Føroyar. Sáttmálin í uppskotinum avloysir tilsvarandi sáttmála frá 1968, ið eisini hevði gildi fyri Føroyar. Sáttmálin snýr seg um skifti av flytipappírum (nordisk flytipapir), tá ið persónur, ið er skrásettur sum búsitandi í einum norðurlandi, flytur ella er fluttur til eitt annað norðurland. Sáttmálin hevur til endamáls at samskipa reglurnar í Norðurlondum um flyting, fastan bústað og fyribils tilhald. Tað, sum er nýtt í sáttmálanum, er fyrst og fremst, at tilhald undir 6 mánaðar vanliga ikki verður roknað sum flyting samanber § 1 í sáttmálanum. Eftir sáttmálanum frá 1968 var tíðaravmarkað tilhald undir 3 mánaðir ikki roknað sum flyting. Sáttmálin hevur verið til ummælis hjá Landsfólkayvirlitinum, ið hevur mælt til at at góðkenna sáttmálan. Tað er heldur ikki neyðugt at broyta verandi lóg um fólkayvirlit frá 1982 til tess at fremja sáttmálan eftir føroyskum rætti, tí tar broytingar, ið krevjast, kunnu gerast fyrisitingarliga.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir eina samd nevnd løgtinginum til at taka undir við uppskoti landsstýrisins til norðurlendskan millumlandasáttmála um fólkaskráseting.

13. Handilssáttmáli við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir hjálagda sáttmála ímillum Europeiska Búskaparliga Felagsskapin øðrumegin og ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hinmegin um sínámillum handilssømdir.

Viðmerkingar

Føroyar fóru sum kunngt ikki saman við Danmark uppí felagsmarknaðin tann 1. januar 1973. Samband Føroya við felagsmarknaðin er viðgjørt í artiklunum 25-27 í fyriskipanini um upptøku Danmarkar í Europeiska Búksparliga Felagsskapin og í frumskjali nr. 2 til fyriskipanina. Eftir hesum hevði Danmark møguleika fyri at geva eina váttan um, at sáttmálarnir eisini skuldu verða galdandi fyri Føroyar.

Fyrst í 1974 boðaði danska stjórnin felagsskapinum frá, at hon kom ikki við nakrari tílíkari váttan, av tí at føroyska heimastýrið ikki tók undir við málinum. Freistin fyri at geva eina tílíka váttan gekk annars út 31 december 1975.

Aftaná at tað var greitt, at Føroyar ikki fóru upp í felagsskapin, varð gjørd ein eintáttað (autonom) skipan um útflutning Føroya til felagsskapin og útflutningin hjá felagsskapinum til Føroya.

Eftir hesi skipan (nr. 2051/74) við seinni broytingum, kunnu ávísar vørur við føroyskum uppruna verða innfluttar í felagsmarknaðin við ávísum tollætta.

Fyri fiskaðarvørur í kapitlunum 25-97 í felags tollvøruskránni var tollurin 0. Lækkaður tollur varð ásettur fyri ávísar fiskavørur í kapitlunum 3, 16 og 23. Toll stigarnir vóru tó nakað ymiskir mótvegis teimum upprunaligu felagsmarknaðarlondunum og t.d. teimum fyrrverandi EFTA londunum, Bretlandi og Írlandi. Av útflutningi til Danmarkar var tollurin eins og frammanundan 0 fyri allar føroyskar vørur, eins og hann hevði verið áðrenn Danmark fór upp í felagsmarknaðin.

Samstundis, sum Føroyar fingu ávísar tollsømdir mótvegis EF, innførdu Føroyar ávísar tollfyrimunir fyri innfluttar vørur úr EF, tó bert á einum avmarkaðum tali av vørum, sum t.d. turkaðari frukt, nøtum og mandlum og ávísum grønmeti, og eru hesir tollfyrimunir framvegis galdandi, samsvarandi nú kunngerð nr. 77

frá 20. juli 1989 um innflutningsgjød á ávísum vørum innfluttar frá og við upprona í felagsmarknaðarlondum.

Samhandilin millum felagsskapin og Føroyar var í 1990 uppá 3,2 mia. kr. Føroyar útflutu fyri tilsamans 2.474 mió. kr., harav 1.996 mió. kr. ella 81% til EF. Av samlaða útflutninginum til EF vóru 97% fiskur og fiskaúrdráttir. Innflutningurin í 1990 var uppá tilsamans 2.063 mió. kr., harav úr EF 1.201 mió. kr. ella 58% av samlaða innflutninginum.

EF-kommissiónin gjørdi í 1988 vart við, at nýtslan hjá limalondunum av ymsum tollstigum mótvegis Føroyum fyri fiskavørur av sama slag ikki var í samsvar við prinsippini hjá tollfelagsskapinum. Eisini mettu teir tað sum heilt greitt, at tann skiftisskipan, ið var galdandi mótvegis Danmark við 0 tolli, var útgingin fyri langari tíð síðani, og at tað sostatt ikki var nakað løgfrøðiligt grundarlag fyri, at Danmark lat føroyskar vørur sleppa inn í felagsmarknaðin uttan at rinda naktan toll.

Hesi ymsu frávik í tollingini av føroyskum vørum komu serliga í ljósmála, tá tann nýggja tollskráin (TARIC) varð innførd í 1988.

Tá reglurnar um tollfyrimunir fyri føroyskar vørur byggir á eina eintáttaða avgerð og sostatt altíð kann broytast av EF-felagskapinum, hevði tað ikki havt tann stóra týdning framyvir at fingið ein rættarúrskurð, um tollingin av føroyskum vørum, ið vóru útfluttar til Danmarkar, fór fram eftir galdani reglum.

Tí bað landsstýrið fstaðinfyri um at fáa tingingar í lag um ein nýggjan sáttmála um tolling av føroyskum vøruútflutningi til EF-londini.

Uppleggið úr Føroyum var at fáa ein fríhandilssáttmála við felagsskapin, soleiðis at eingin tollur varð lagdur á vøruhandilin partanna millum.

EF førdi fram, at teir ikki kundu ganga við til ein heilh frían handil, tí teir mettu summar fiskavørur at vera so viðkvæmar fyri teirra marknað, at teir ikki kundu loyva avmarkaðum tollfrium innflutningi.

Tær fiskavørur, sum mettar vórðu at vera viðkvæmar, vóru t.d. laksur, síl, rækjur og líðugtviðgjørdar fiskavørur, har kravi varð, at ásettar vórðu kvotur fyri tollfría innflutninginum, meðan aðrar vørur vórðu mettar sum minni viðkvæmar, har tollsoft máttu ásetast.

Av tí at EF kravdi ávísar vørur undantiknar tollfrælsi, kravdu Føroyar eisini, at ávísar vørur úr EF vórðu undantiknar treytini um tollfrælsi, t.d. seyðakjøt og drekkinmjólk umfram aðrir úrdráttir úr mjólk, tó ostur og smør undantikin.

Úrslitið av tingingunum varð, at undirskrivað varð eitt uppskot til ein sáttmála millum Europeiska Búskaparliga Felagsskpin øðrumegin og ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýrið hinumegin um tollviðurskiftini partanna millum. At sáttmáli verður gjørdur á henda hátt, t.d. millum EBF øðrumegin og stjórn DK og FRL hinumegin, er fordømi um í rammusáttmálanum frá 15. mars 1977 um

sínamillum fiskiskap. Sáttmálin er galdandi í Føroyum øðrumegin og EBF hinumegin, t.e. eisini fyri Danmørkin, ið sostatt sambært sáttmálanum skal tolla føroyska vøru eins og hini EF-londini.

Sáttmálin loyvir Føroyum tollfrían útflutning til EF-limalondini fyri allan fisk, sum veiddur er av føroyskum skipum í Norðuratlantshavi, og sum føroyingar higartil hava fiskað. Undantiknar verða tó ávísar fiskavørur, sum EF metir sum viðkvæmar, har kvotur og loft eru ásett, samanber skjal 1 við yvirliti yvir hesar vørur.

Kvoturnar og loftini, laksur undantikin, byggja í høvuðsheitunum á tann útflutning, ið Føroyar higartil hava havt til EF.

Fyri at tryggja, at tað skal vera møguligt at umleggja okkara framleiðslu, er í sáttmálanum innførdur ein menningarklausulur (§ 34), har felagsskapurin tekur upp til viðgerðar møguleikarnar fyri at betra um atgongd fyri ávísar vørur og at víðka sínar tollsømdir fyri føroyskar fiskavørur til eisini at umfata nýggj fiskasløg, sum føroysk fiskifør ikki hava veitt, ella til at umfata bartil knýttar fiskavørur, sum føroyski fiskídnaðurin í løtuni ikki framleiðir.

Eftir § 30 í sáttmálanum verður sett ein felagsnevnd við umboðum fyri partarnar at umsita sáttmálan og kunnu partarnir fáa síni áhugamál viðgjørd í hesi nevnd, t.d. um víðkan av vøruøkinum, sum sáttmálin skal fevna um.

Í sáttmálanum er eisini ein mestafyrimunarregla (§ 18), har partarnir altíð binda seg til at veita hvørjum øðrum mestu fyrimunarviðgerð samsvarandi vanliga sáttmálanum um toll- og uttanríkishandil (GATT). Eisini hevur felagsskapurin í serligum skjali til sáttmálan váttað, at um EFTA fær eina betri skipan fyri fiskavørur enn okkara, vilja teir taka upp tingingar um møguleikan fyri at veita okkum somu søndir.

Sum áður nevnt mugu vørur, ið útflutar verða úr Føroyum til EF við tollfyrimuni, eins og galdandi er undir núverandi skipan, hava uppruna sín í Føroyum.

Fyri fisk og vørur framleiddar úr fiski vil hetta siga, at fiskurin ella rávøran, sum lidna vøran verður framleidd úr, skal vera veidd við skipum skrásettum í Føroyum, sum sigla undir føroyskum flaggi, og har føroyingar eiga í minsta lagi 50% í skipinum. Eisini krevst, at øll yvirmanningin og í minsta lagi 75% av manningini eru føroyingar ella ríkisborgarar í felagsskapinum.

Meðan vanligu upprunareglurnar fyri ídnaðarvørur eru, at rávøran kann verða innflutt, treytað av at góðskingarstigið á lidnu vøruni er omanfyri eitt ávíst mark, eru hesar reglur ikki galdandi fyri fiskavørur, líkamikið hvussu høgt góðskingarstigið er.

Í sambandi við at avtalan skal koma í gildi 1. januar 1992, binda Føroyar seg til at samtykkja eina nýggja tolllóg galdandi frá 1. januar 1992, har vørur úr EF-londum verða viðgjørdar tollfrítt við teimum í frumskjali 2 og 4 nevndu undan-

tøkum. Við hesi skipan verður tað møguligt hjá landsstýrinum at krevja inn líggjartoll eisini í 1992 til meirvirðisskipanin kann verða liðug at seta í gildi 1. januar 1993.

Við óbroyttum útflutningsmongdum og sama útflutningsmynstri er tolllættin eftir sáttmálanum útroknaður til at vera umeið 50-60 mió.kr.

Broytti tollstigin á útfluttum vørum til EF fer at føra við sær, at framleiðslan verður umløgd til meira virðismiklar vørur, sum ógjørligt hevur verið at útflutt við núverandi tollgjøldum, soleiðis at samlaði vinningurin av sáttmálanum fyri føroyska samfelagið skuldi verið fleiri ferðir virðið á tí beinleiðis sparda tollinum í dag.

Skjal 1.

Úrslit av frihandilstingingunum millum EEC og Føroyar/Danmark hvat fiski viðvíkur.

Føroyar kunnu til felagsskapin útflyta allar higartil útfluttar fiskavørur uttan toll og nøgdaravmarkingar, undantiknar eru niðanfyri tilskilaðu vørur, sum kunnu útflytast tollfrítt, men við tilskilaðu nøgdaravmarkingum.

Kvotur		**Úrslit: tons**
TQ1.	Síl, livandi, fesk, fryst flak, froknað	700
TQ 2.	Laksur, livandi, feskur, frystur, flak froknað	4.900
TQ 3.	Síl/ laksur, viðgjørdur/ niðursjóðaður	400
TQ 4.	Aðrar viðgjørdar/ niðursjóðaðar vørur	2.000
TQ 5.	Pilkaðar Rækjur	2.000
Loft:		
RC1.	Síld, fesk, fryst	2.000
RC2.	Makrelur, feskur	3.000
RC3.	Upsaflak og fars, fryst	25.000
RC4.	Saltað flak av "øðrum sløgum"	5.000
RC5.	Royktur fiskur	1.000
RC6.	Kongafiskur, feskur, frystur, flak froknað	12.600
RC7.	Fekst flak, ikki toskur ella kongafiskur	3.000
RC8.	Longa, fryst flak	550
RC9.	Svartkjaftur, fars, flak, fryst	1.800
RC10.	"Onnur sløg" saltað, ikki flak	1.400
RC11.	Rækjur	11.000
RC12.	Síld hálvfabrikata	500

TQ = Tollkvota, har tollurin verður álagdur aftur, tá útflutningurin fer upp um ásettu nogdina.

RC = Tollloft, har tollur kann áleggjast aftur,tá útflutningurin fer upp um tilskilaðu nøgdina, um so er at trupulleikar eru.

Álit

í

Løgtingsmál nr. 13/1991: Handilssáttmáli við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 3. oktober 1991 og undir 1 viðgerð 31. oktober 1991 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra, Leivur Gregersen stjóra á Tollstovuni og Árna Olafsson, serkønan í føroyskum málum í uttanríkisráðnum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Olaf Olsen. Birgir Danielsen, Sverre Midjord og Heini Johansen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja landsstýrisuppskotið.

Ein minniluti (Edmund Joensen setur fram niðanfyri standandi uppskot til samtyktar og hevur hesar viðmerkingar:

Sambandsflokkurin gekk inn fyri at byrjast skuldi við samráðingum við EBF um eina fríhandilsavtalu. Hetta sá eisini í byrjanini út til at vera rætta avgerðin. Samráðingarmenn okkara sóu ljóst upp á vánirnar at fáa eina slíka.

Úrslitið, sum nú fyriliggur, er ikki tað, sum Sambandsflokkurin gekk inn fyri, og sum vit langt fram á vegnum roknaðu við, fór at koma.

Flokkurin gekk inn fyri einari avtalu, sum fór at menna tað føroyska samfelagið, ikki øvugt.

Um hesa avtaluna kann minnilutin m.a. føra fram:

1. Vinnulívsmenn hava víst á, at fleiri 100 føroysk arbeiðspláss fara at hvørva.
2. Avtalan forðar okkum í at keypa og virka rávørur úr triðjalondum og selja hesar á EBF-marknaðinum í kapping við aðrar.
4. Samhandilin við triðjalond gerst munandi torførari, so leingi hendan avtalan stendur einsamøll. Hetta merkist longu í praksis í formi av komandi nýggja GATT-tollinum.
5. Ein annar praktiskur trupulleiki er, at føroyingar, sum higartil hava verið umborð í donskum skipum, nú verða koyrdir í land, flyta teir ikki úr Føroyum.
6. Avtalan fevnir um kvotur og loft, sum koma at forða fyri teirri menning av okkara samfelag, sum ætlanin var við einari fríhandilsavtalu.

Sum nevnt í viðmerkingunum til málið frá landsstýrinum, inniheldur uppskotið til handilsavtaluna millum Føroyar og EBF fyri tað fyrsta eina mestafyrimunar reglu (§ 18), har partarnir altíð binda seg til at veita hvørjum øðrum mestu fyrimunarviðgerð samsvarandi vanliga sáttmálanum um toll og uttanríksihandil (GATT), og fyri tað næsta eina váttan frá EBF, um at EFTA fær eina betri skipan enn okkara, vilja teir taka upp tingingar um møguleikan fyri at veita okkum sømdir.

Tað er eingin ivi um, at innihaldið í avtaluni millum EBF og EFTA ger tað rætt og neydugt at taka upp nýggjar samráðingar við EBF fyri at tryggja okkum eins góðar sømdir og EFTA-londini hava fingið, serliga Ísland.

Her verður serliga hugsað um grundgevingarnar fyri, at Ísland hevur fingið størstu fyrimunirnar. Hetta kemur av serliga økispolitikkinum (regionalpolitik) hjá EBF. Allir eru samdir um rættleikan í, at Ísland fær hesar fyrimunir.

Hinvegin kann eingi ivi vera um, at hevur Ísland tørv á og rætt til serligar fyrimunir í handilsavtalu við EBF, so hava Føroyar tað í enn størri mun.

Minnilutin er sostatt samfórdur um, at hendan avtalan á ongan hátt kann metast sum eitt bíðugt úrslit, men í besta føri sum eitt ov stutt stig á leiðini fram móti einari endaligari loysn.

Minnilutin kann tí bert taka undir við hesi avtalu, um trygd fæst fyri, at arbeitt verður víðari við spurningunum um at veita okkum so góðar sømdir yvirfyri EBF sum gjørligt. Tað er sostatt ein treyt fyri, at minnilutin atkvøður fyri málinum, at niðanfyri vístu uppskot til samtyktar fyrst verða samtykt.

I Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at taka upp nýggjar samráðingar við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin um:

1. At bøta um fyriliggjandi uppskot til handilsavtalu, nú EBF og EFTA hava gjørt sínamillum avtalu.
2. At fyrireika eitt nærri samstarv við EBF, um ein handilsavtala inniber.

Ein annar minniluti (Hergeir Nielsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tjóðveldisflokkurin góðtekur ikki, at tað verður avgjørt í einari avtalu við EF, at ein skipan við meirvirðisgjaldi (momsi) verður sett í gildi í Føroyum. Flokkurin átalar, at hendan skipan ikki er komin til umrøðu á tingi, áðrenn samgongan bindir seg úteftir til at fremja hana.

Tjóðveldisflokkurin átalar og harmast um mammagongdina, sum samgongan hevur nýtt upp undir endan í hesum samráðingum. T.d. var tað skeivt av lands-

stýrinum at lata sær eyðmýkingina í Bruxelles lynda, har eingin kompetentur samráðingarmyndugleiki hirdi at tosa við umboð okkara á politiskum stigi.

Undir sjálvari samráðingargongdini hevur fleiri ferðir verið roynt at vinna føroyingum størri sømdir, men eru hesar royndir oftast vístar aftur við teirri grundgeving, at EF ikki fær a' la carte sáttmálar við onnur lond, og er samráðingarúrslitið tí tað longsta, sum mótparturin kundi ganga við til í hesum umfari.

EF hevur víst á, at verður hendan avtalan ikki góðkend, so feltur alt á gólvið, og Føroyar enda møguliga sum triðjaland mótvegis EF. Roknast kann so við nýggjum samráðingum, og ilt er at meta um, hvat úrslitið av teimum verður.

Tjóðveldisflokkurin ásannar samstundis, at avtalan gevur føroyskum útflutningi betri tollsømdir, enn avtalan frá 1974 gjørdi. Eisini vísir flokkurin á, at í avtaluni er møguleiki tryggjaður fyri, at samráðingar til eina og hvørja tíð kunnu takast upp av nýggjum, um tørvur er á at hækka kvotur ella loft fyri útflutningi av t.d. tilvirkaðum vørum sum frálíður. Somuleiðis bindir EF seg til at samráðast við Føroyar um møguligar fyrimunir, sum EFTA kanska fær í sínum sáttmála fram um Føroyar.

Minnilutin átalar tó, at hesin sáttmáli, sum er nevndur í okkara sáttmála, ikki er komin okkum til kanningar, áðrenn málið nú skal avgreiðast av løgtinginum. M.a. er víst á undir 1. viðgerð, at menningarklausulurin er alt ov neyvt orðaður, soleiðis at EF í alt ov stóran mun setir treytirnar fyri teimum samráðingarmøguleikum, ið ætlaðar vóru hesum klausuli.

Minnilutin hevur undir viðgerðini víst á, at trygdar- ella hernaðarmál eru umrødd í sáttmálanum, og at telvað hevur verið um strategisku støðu Føroya fyrr í altjóða sambandi, men hava vit ikki fingið nærri kunnleika til hesi viðurskifti undir viðgerðini.

Við tí fyrivarni, at tað sáttmálauppskotið, sum kemur til atkvøðugreiðslu, er rættað fyri tey teknisku brek, ið víst vóru á undir 1. viðgerð, heldur Tjóðveldisflokkurin, at fragasta loysnin er at atkvøða fyri hesum uppskoti hóast tað, sum frammanfyri nevnt, eru nógvir taettir, sum ikki eru nóg væl týstir og alt ov lúðð við-gjørdir.

Verandi skipan er ikki nakar valkostur, tí at EF hevur sagt hana upp.

Eina nýggja autonoma skipan hava teir bóðt við at seta í verk, men hon hevði bara verið eitt trengri enn tann, sum er komin undir land.

Ein tollunión vildi verið betur enn ein fríhandilssáttmáli, tá ið tað kemur til upprunareglur. Hesin spurningur var tó viðgjørdur longu í 1989 og hevði fleiri neyvari bindingar við sær, m.a. kvotur fyri marknað.

Innliman í EFTA var av EF hildið vera eina ov fløkta skipan fyri EF-limalandinum Danmark at hava Føroya vegna. Tíbetur fyri okkara viðkomandi vísandi til EF-EFTA sáttmálan, sum undirskrivaður er. Hesin er eftir øllum at døma grund-

arlagið fyri einum endaligum limaskapi hjá EFTA-londunum.

Limaskapur í EF er av góðum grundum ikki viðgjørdur nærri.

Vísandi til hesar viðmerkingar tekur Tjóðveldisflokkurin undir við verandi sam ráðingarúrsliti.

Hin triðji minnilutin (Tórdur Niclasen) er av teirri áskoðan, at hóast sáttmálin hevur ávísar fyrimunir, so tykjast vansarnir at vera so stórir, at ivasamt er, um tað er ráðiligt fyri tað føroyska samfelagið at binda seg í hesum sáttmála, áðrenn greiða er fingin á ivaspurningum og veruligu avleiðingunum av hesum sáttmála.

Hvat stuðulinum til fiskivinnuna viðvíkur, er tað vorðið greitt, at hesin ikki kann halda fram í verandi líki, og dugir minnilutin ikki at síggja, at nakað er til hindurs fyri, at EF longu við ársbyrjan 92 kann gera vart við skipanina, soleiðis sum hon er ætlað á løgtingsfiggjarlóggini fyri 92 – hóast tað áður frá føroyskari (politiskari) síðu hevur ljóðað, at 1993 varð árið, har neyðugar broytingar á hesum øki máttu fremjast.

Hvat umlegging av stuðlinum viðvíkur, tykjast ongar fyrireikingar frá føroysk ari síðu at verða gjørdar, um EF stillar krøv longu við ársbyrjan 1992! Hvat fiskivinnuni annars viðvíkur, er tað nógv, sum bendir á, at tað fer at vera kærkomið hjá EF at fáa rávøru úr Føroyum til europeiska fiskiídnaðin, og kann hetta lættliga gerast ein sonn vanlukka fyri 100 tals verkafólk, sum hava sítt dagliga yrki á fiskavirkjum kring land okkara. Til tess at fyribyrgja eini slíkari møguligari gongd, verður neyðugt við politiskum tiltøkum, og verður tí sett fram soljóðandi:

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta neyðug tiltøk í verk, sum hava til endamáls, at rávøra í minst møguligan mun verður flutt út til virkingar í øðrum londum.

Tá hugsað verður um orð Richardt Vork, samráðingarleiðara hjá EF, har hesin vísandi til handilssáttmálan m.a. segði seg vóna at hava givið eitt politiskt signal um, at Føroyar vóru velkomnar upp í EF, og at EF vónaði, at Føroyar fóru at gerast limir, so eigur at havast í huga, at størsta orsøkin til, at hesin felagsskapur við sínum uml. 400 mió. íbúgvum vísir slíkan ans fyri, at Føroyar gerast limir í EF, er rávøran úr havinum!

Avleiðingarnar fyri heimaídnaðin fara helst at verða dupraar, og hóast tað frá politiskari síðu mangan hevur ljóðað, at neyðugar fortreytir fyri kappingarlori áttu at

gevast vinnuni, so er eitki at ivast í, at handilsavtalan við EF kemur at reynast mønustingitr fyri stóran part av heimaídnaðinum og harvið gerast óivað fleiri hundrað afturat arbeiðsleys.

Føroyska vinnulívið hevur mangan sjálvt víst á tað, sum virkar darvandi á kappingarførið, serliga orkuprísurin og oljuavgjaldið!

Í røðu løgmans á ólavsøku varð m.a. sagt: "...at broytu handilsfyritreytirnar fara at seta krøv til føroyskar fyritøkur, bæði tá talan er um vøru til útflutning og til heimamarknaðin."

Já sannliga, men krøvini til politikkararnar verða ikki minni til tess at skapa neyðugar fortreytir hjá vinnuni, (sum tá verður eftir) í kapping við útlendskar kappingarneytar!

Eitt fyribrigdi, sum nógv hevur verið nevnt í sambond við handilssáttmálan við EF, er hin sokallaða MOMS-skipanin. Hóast orðið sjálvt hevur verið mangan tikið upp á tungu, tykist tað ikki at vera Føroya fólki kunnugt, hvør henda skipan er, og hvørjar tær praktisku avleiðingarnar verða av hesi skipan, sum landsstýrið longu hevur bundið seg til í sambond við sáttmálan.

Tá tykist fyri vist, at MOMS-skipanin kemur ikki at gera tað lættari fíggjarliga at vera føroyingur - tvørturímóti. Tí MOMSUR kemur eisini at verða lagdur á ymiskar tænastuveitingar, og kemur hetta serliga at tyngja um hjá lágløntum - og teim, sum frammanundan hava trupult at fáa endarnar at røkka.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) metir henda handilssáttmála við EF at fáa stórar og í nógvum føri sera álvarsligar avleiðingar fyri landið og tað fólk, ið her búleikast, at rættast var, at fólkið sjálvt fekk høvi at siga sína hugsan og taka avgerð í hesum týðandi máli. Hetta kundi verið gjørt við fólkaatkvøðu, eftir at politikkararnir sjálvir kendu avleiðingarnar av sáttmálanum, og at landsstýrið nágreiniliga hevði kunnað landsins borgarar um fyrimunir/vansar við hesum sátumála.

Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi:

III Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri fólkaatkvøðu um handilssáttmálan við EF.

Broytingaruppskot

í

Løgtingsmáli nr. 13/1991: Handilssáttmáli við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin.

Viðmerkingar

Longu í juni mánað í ár gjørdi Sjálvstýrisflokkurin vart við, at politisk viðgerð í tinginum eftir, at undirskrift varð fest á blað, mátti metast sum tála, og tí var mælt til, at hetta týdningarmikla mál fekk holla politiska viðgerð, áðrenn sáttmálin við ella uttan fyrivarni varð undirskrivaður.

Men áheitan Sjálvstýrisfloksins varð ikki fylgd, og allir flokkar á tingi uttan Sjálvstýrisflokkurin tóku undir við samráðingarúrslitinum longu í juni mánað, og hetta førdi eisini við sær, at 1. viðgerðin, sum fór fram 31. oktober 1991 var ein vælfyriskipaður sjónleikur, men sum seinni er avdúkaður sum størsta ráðagerðin, framd móti føroysku tjóðini í nýggjari tíð, og sum hevur til endamáls, innan lá ár at gera Føroyar til limir í EF innan danskar karmar.

Sjálvstýrisflokkurin ger vart við:

1) at gingið er ikki eftir handilsligum sjónarmiðum, at eingin handilslig javnvág er í samhandlinum við EF,
2) at fyrimonirnir við EF upp á 50 mió. kr. hvørva í GATT-skipanini,
3) at allar vørur dýrka munandi orsakað av broytingini frá FOB til CIF, umframt 3. landsvørur orsakað av GATT-tolli,
4) at eini 500 arbeiðspláss eru í vanda, tá avtalan kemur í gildi,
5) at eingir búskaparligir fyrimunir eru við góðsking ella menning av framleiðslu á føroyskum flakavirkjum,

Tað er nú vorðið heilt greitt:

– at hóast avtalan við EF á prenti er betri enn tann avtalatt, sum vit í dag hava, so mugu vit kortini viðganga, at allar tær treytir, sum fylgja við avtaluni, koma at standa sum eitt illa fyrireikað arbeiði frá føroyskari síðu, sum ger, at eingir fyrimunir eru eftir, sum tala fyri, at avtalan við EF yvirhøvur eigur at fáa gildi fyri Føroyar soleiðis, sum hon í dag fyriliggur.

Alt tað, sum forfedrar okkara stríddust og bardust fyri:

– at gera føroysku tjóðina sjálvbjargna á øllum økjum, verður oytt burtur og lagt í sor av flokkum, sum ikki longur sóu seg førar fyri at stjórna landi okkara á ein mannsømiligan hátt.

Soleiðis sum viðurskiftini í dag eru kunngjørd fyri okkum og Føroya fólki, er Sjálvstýrisflokkurin aftaná viðgerðirnar sannførdur um, at EF avtalan kann gerast ein vaulakka fyri føroysku tjóðina, og tí setir Sjálvstýrisflokkurin fram soljóðandi:

I Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at taka uppskotið um handilssáttmálan við Europeiska Búskaparliga felagsskapin aftur beinanvegin.

II Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at taka upp nýggjar samráðingar við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin og at leggja úrslitið av samráðingunum fyri Føroya Løgting, áðrenn støða yvirhøvur verður tikin til nýggja uppskotið.

Einasta bjarging hjá føroyska fiskaídnaðinum, heimaídnaðinum, fiski- og útróðrarmanningum og lønmóttakarunum í síni heild, er, at nýggjar samráðingar fara fram millum partarnar.

Sjálvstýrisflokkurin heldur tað vera neyðugt at leggja størri dent á marknaðir, sum liggja uttan fyri EF og setir tí fram soljóðandi:

III Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við onnur lond um handilssáttmálar, og at leggja úrslitið av samráðingunum fyri Føroya Løgting, áðrenn støða yvirhøvur verður tikin til samráðingarúrslitið.

Ískoytisálit

í

Løgtingsmáli nr. 13/1991: Handilssáttmáli við Europeiska Búskaparligu Felagsskapin.

Viðmerkingar

Longu í juni mánað í ár gjørdi Sjálvstýrisflokkurin vart við, at politisk viðgerð í tinginum eftir, at undirskrift varð fest á blað, máttu metast sum tapt, og tí varð mælt til, at hetta týdningarmikla mál fekk holla politiska viðgerð, áðrenn satt málin við ella uttan fyrivarni varð undirskrivaður.

Men áheitan Sjálvstýrisfloksins varð ikki fylgd, og allir flokkar á tingi uttan Sjálvstýrisflokkurin tóku undir við samráðingarúrslitinum longu í juni mánað, og hetta førdi eisini við sær, at 1. viðgerðin, sum fór fram 31. oktober 1991 var ein vælfyriskipaður sjónleikur, men sum seinni er avdúkaður sum stórsta ráðageraðin, fraund móti føroysku tjóðini í nýggjari tíð, og sum bevur til endamáls innan tað ár at gera Føroyar til limir í EF innan danskar karmar.

14. Broyting av praksis í samband við almannakunngerðing av tvingsilssølum

Uppskot

til

samtykar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við avvarðandi myndugleikar um at fáa broytt praksis í sambond við almannakunngering av tvingsilssølum.

Viðmerkingar

Orsakað av m.a. broyttum fortreytum fyri lønandi vinnu her á landi tey seinastu 2-3 árini, hava mong húski ikki fingið endarnar at røkka saman og eru tí komin í fíggjarliga trongstoðu.

Eitt tað besta prógvið um hetta eru tær mongu tvingsilssølurnar, sum nærum dag og dagliga verða almannakunngjørdar.

Tá hugsað verður um, at aftanfyri hvørja tvingsilssølu er talan um mannalagnar - oftast familjur við børnum - er tað væl skiljandi, at tað má kennast sum steinur oman á byrðu undir slíkum umstøðum at verða almannakunngjørdur.

Praksis av almannakunngering av tvingsilssølum er jú, at umframt matr. nr. og bústað verður avvarðandi persónur navngivin.

Tær menniskjansligu avleiðingarnar av slíkari almannakunngering eru óivað nógv svárari enn nangan verður givið far um og kennist hetta serliga meint, har børnini koma at hoyra fyri tað.

Í rættargangslógini fyri Føroyar § 566, stk. 2 verður sagt:

"Bekendtgørelsen skal betegne auktionen som tvangsauktion og ud over tid og sted for auktionen indeholde oplysninger om alle forhold, der kan antages at have væsentlig betydning for ejendommens værdi.

Bekendtgørelsen skal så vidt muligt indeholde oplysninger om ejendommens matrikkelnummer, nøjagtige adresse, ejendomsværdi, karakter, areal og anvendelse, herunder oplysning om størrelse af det bebyggede areal og dets indretning."

Sum skilst átti her at verið møguleiki fyri at broyta praksis uttan at lógarbroyting fór fram - og ikki skuldi verið neyðugt í líkum samfelag sum okkara, at persónar vórðu navngivnir í almennari lýsing av tvingsilssølum.

Til tess at broyta galdandi praksis og fyribyrgja óneydugum sorgarleikum í samband við tvingsilssølur, verður við hesum heitt á landsstýrið um at gera seg galdandi.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 14/1991: Broyting av praksis í samband við almannakunngerð av tvingsilssølum.

Málið er lagt fram av Tordi J. Nielsen, løgtingsmanni, tann 3. oktober 1991 og eftir 1. viðgerð 7. november 1991 beint í rættarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

15. Arbeiðsskapandi tiltøk sum fyribyrgjan av arbeiðsloysi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at taka neyðug stig til arbeiðsskapandi virksemi kring landið.

Viðmerkingar

Orsakað dyggum fløguavmarkingum innan tað almenna eins væl og tað privata, hevur av sonnum stórt arbeiðsloysi tikið seg upp her á landi.

Hetta hevur havt daprar menniskjansligar og sosialar avleiðingar við sær og rakt mangan familju kring oyggjarnar hart.

Rætt er, at tær ógvusligu skerjingarnar í fløguvirkseminum hava havt positiva ávirkan á handilsjavnan, men ikki kann síggjast burtur frá tí sosiala aldudali, sum er komin í kjalavørrinum av hesum.

Verður hugt eftir t.d. upphæddini, ið goldin er eftir forsorgarlógini, so gevur hetta okkum eina ábending av, hvussu álvarlig arbeiðsloysisstøðan í landi okkara er!

Heilar 21,5 mió. kr. vórðu nýttar fyrra hálvárið 1991 í mun til 18,073 mió. kr. fyri alt 1990.

Talið av teim, ið fingu hendа arbeiðsloysisstuðul yvir forsorgarlógina fyri alt árið 1990 var 3332, meðan talið fyri fyrra hálvár 1991 var heili 3922.

Tá talan her bert er um stuðul yvir forsorgarlógina, gevur tað ikki eina sanna mynd av arbeiðsloysinum, men bert í hvønn mun ein partur av teimum, ið eru rakt av arbeiðsloysi, hava kunnað fingið peningaliga hjálp eftir forsorgarlógini.

Sjálvandi skulu tey, ið eru arbeiðsleys hava fíggjarstuðul. Tí fíggjarskyldurnar (matur, klæði, rentur, avdrøg v.m.) hvørva jú ikki, tá ein gerst arbeiðsleysur!

Tó eigur at havast í huga, at hetta er eitt nýtt fyribrigdi millum føroyingin - skapt tey seinastu árini. Lín sera óheppin og ógagnlig leið at vera komin inn á - og ikki tað, sum cyðkent hevur ynski og vilja føroyingsins, har arbeiðsheilsa var til staðar.

Tað er tí sera umráðandi, at landsins myndugleiki tekur neyðug stig til at broyta hesa óhepnu gongd.

Tað er skilaleyst og samfelagsskaðiligt um henda gongd heldur fram.

Meginreglan í einum vælskipaðum samfelag má og skal verða, at tað skal loysa seg at arbeiða og ikki sum nú, á tí skráplani vit eru komin inn á, at peningur í millióna upphæddum verður givin fyri einki at gera!!

Tá hugsað verður um, at størsti parturin av teim, ið eru komin út í arbeiðsloysi eru ung í aldrinum 18 - 24 ár - annars fólk í besta aldri - so má hetta av sonnum sigast at verða vána fortreytir hjá ungfólki at fóta sær í einum samfelag, sum stillar síni krøv til einstaklingin.

Vælskiljandi kennist hetta tí hugstoytt hjá unga ættarliði okkara og hjá teim mongu kring landið, sum fegin vildu brotið upp um armar, men einki er at tríva í.

Tað skal loysa seg at arbeiða, og er tað burturvið, at millióնaupphæddir verða játtaðar yvir forsorgarlógina til arbeiðsloysisstuðul. Heldur átti peningur at verið nýttur til arbeiðsskapandi virksemi!

Arbeiðsloysistrygging er ikki loysnin uppá arbeiðsloysi. Tí eiga nú neyðug stig frá almennara síðu at verða tikin, til tess at skapa fortreytir hjá arbeiðsleysum fyri aftur at koma í arbeiði.

Frá almennari síðu kann hetta gerast í samstarvi við vinnuna og kommunurnar kring landið.

Arbeiðsloysið er ein stór avbjóðing til politikkarnar og er tað tí umráðandi, at bæði samgongan og andstøðan standa saman í at fáa loyst henda trupulleika, sum rakt hevur so dygt manga familju kring landið.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 15/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk sum fyribyrgjan av arbeiðsloysi

Málið er lagt fram av Fordi J. Niclasen tann 3. oktober 1991 og eftir 1. viðgerð 7. november 1991 beint í Arbeiðaramálanevndina.

16. Løgtingslóg um eyka rakstrar- og manningarstudning

Uppskot

til

Løgtingslóg um eyka rakstrar- og manningarstudning.

Lagtingslov om ekstra drifts- og mandskabsstøtte.

§ 1.

Heimilað verður einum meiriluta av samlaða limatalinum í landsstýrinum við góðkenning av einum meiriluta av samlaða limatalinum í Fiskivinnunevnd Løgtingsins at veita manningini á og eigara av føroyskum fiskifari eina studning pr. kg. fyri tann ráfisk fiskifarið hevur veitt og avreiðir til føroyskt fiskavirki.

Stk. 2. Eyka rakstrar- og manningarstudningur verður ásettur fyri tíðarskeiðið 1. oktober til 31. desember 1991.

§ 1.

Ved denne lov bemyndiges et flertal af det samlede medlemsantal i landsstyret med godkendelse af et flertal af det samlede medlemsantal i lagtingsets fiskeriudvalg at yde mandskab på og ejere af færøsk fiskefartøj støtte pr. kg. for den råfisk fiskefartøjet har fanget og indbandlet til færøsk fiskevirksomhed.

Stk. 2. Ekstra drifts- og mandskabsstøtte fastsættes for tidsrummet 1. oktober til 31. december 1991.

§ 2.

Fiskasløgini, sum koma undir skipanina, eru toskur, hýsa, brosma, longa, blálonga, upsi, kongafiskur, svartkalvi og hvítingur.

§ 2.

Fiskearterne, som omfattes af ordningen er torsk, kuller, brosme, lange, blå lange, sej, rødfisk, helleflsk og hvitling.

§ 3.

Í avrokningini avroknar ráfiskakeypari samstundis rakstrar- og manningarstudningin til seljaran. Ráfiskakeyparin ger upp til Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna fyri hvørja viku, tað hann hevur goldið í rakstrar- og manningarstudningi, grunnurin endurgjeldur honum rakstrar- og manningarstudningin.

§ 4.

Landsstýrinum verður heimilað at gera gjøllari reglur til fremjing av lógini.

§ 5.

Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna fyrisitur stuðningsskipanini.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1991, og fer úr gildi 31. desember 1991.

§ 3.

Ved afregningen afregner fiskekøberen samtidig drifts- og mandskabsstøtte til sælgeren. Råfiskekøberen opgør til Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna hver uge den drifts- og mandskabsstøtte, som den har udbetalt; fonden refunderer denne drifts- og mandskabsstøtten.

§ 4.

Landsstyret bemyndiges til at udforme nærmere regler for lovens gennemførelse.

§ 5.

Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna administrerer støtteordningen.

§ 6.

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1991, og ophæves 31. december 1991.

Viðmerkingar

Semja er í samgongunni og landsstýrinum um, at skipanin við rakstrar- og manningarstudningum skal halda fram hetta árið út.

17. Ígildissetan av "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser"

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til at uppskot til "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser" verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar

Lógaruppskotið inniber tvær høvuðsbroytingar. Tann fyrsta er § 9 í forsorgarlógini, sum verður broytt soleiðis, at orðaljóðið á leið samsvarar við la § 9, sum var galdandi til 1. januar 1988.

Broytingin førir við sær, at upphæddin, sum fáast kann frá Almannastovuni vegna arbeiðsloysi, minkar nakað. Grundgevingin fyri broytingini er, at við galdandi § 9 er stuðulsupphæddin vegna arbeiðsloysi nakað hægri enn roknast kann við, at ein komandi sjálvboðin arbeiðsloysistrygging fer at kunna gjalda út. Landsstýrið heldur, at hetta tí kann fáa óheppnar avleiðingar fyri undirtøkuna av eini nýggjari arbeiðsloysistrygging.

Hin broytingin er í dagpeningalógini § 24, har skotið verður upp, at gjaldið til sjálvbodnu dagpeningatryggingina skal svara til 2/5 í staðin fyri sum nú 3/4 av bruttoútreiðslunum til skipanina.

Grundgevingin fyri hesi broyting er, at sambært lógini skulu inntøkurnar av gjøldunum frá teimum tryggjaðu svara til 75% av bruttoútreiðslunum. Inntøkurnar av gjøldunum í dag svara einans til 70% av bruttoútreiðslunum, og hava ríkismyndugleikarnir kravt, at vit umgangandi áseta gjøldini sambært lógini. Landsstýrið ásannar tó, at ein so stór hækking av gjøldunum er púra órímilig, og hevur landsstýrið tí ásett gjøldini, so tey svara til 40% av bruttoútreiðslunum. Tey millumliggjandi 35% verða tí í fyrstu syftu latin sum landskassastuðningur til skipanina, men ynskir landsstýrið við tí her framlagda lógaruppskotinum at fáa lógina broytta soleiðis, at gjøldini framyvir skulu svara til 40% av bruttoútreiðslunum.

Landsstýrið vísir annars til lógaruppskotið og viðmerkingar tess, men skal dentur verða lagdur á, at ætlanin er, at lógarbroytingin viðvíkjandi forsorgarlógini ikki skal fáa gildi fyrr enn ein arbeiðsloysistryggingin er farin at virka.

Forslag

til

Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser.

§ 1.

1. I § 9, stk. 1, udgår: "svigtende arbejdsmuligheder".

2. I § 9, stk. 2, 1. pkt., affattes således:
"Som hjælp til underhold i henhold til stk. 1, kan i almindelighed højst udbetales et beløb svarende til folkepensionens grundbeløb med et tillæg for hvert barn svarende til børnetillægget efter lov for Færøerne om folkepension."
Pkt. 2 og 3 forbliver uændret.

3. Ny § 9, stk. 3, affattes således:
Stk. 3: "Der kan i trangstilfælde ydes hjælp til personer, der på grund af svigtende arbejdsmuligheder i en begrænset tid er afskåret fra at skaffe det fornødne til deres eget eller familiens underhold. Denne hjælp kan højst udgøre et beløb svarende til folkepensionen, jvf. § 13, stk. 1, med et tillæg for hvert barn svarende til børnetillægget efter lov for Færøerne om folkepension. Reglen i stk. 2, 3. pkt. er også gældene for denne hjælp".

4. I § 9, stk. 3 som bliver § 9, stk. 4, indsættes efter "stk. 2": "og stk. 3".

§ 2.

I lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel, jvf. lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 foretages følgende ændring.

1. I § 24 udgår : "3/4" og i stedet indsættes "2/5".

§ 3.

Socialministeren bemyndiges til i bekendtgørelse af fastsætte tidspunktet for lovens ikraftræden.

Bemærkninger til lovforslagets enkelte bestemmelser.

§ 1.

Færøernes Landsstyre har tidligere i 1991 nedsat et udvalg, der skal udfærdige et forslag til en arbejdsløshedsforsikring samt arbejdsanvisning på Færøerne. Ud-

valget skal afgive betænkning til landsstyret inden udgangen af 1991, hvorefter man forventer at en arbejdsløshedsforsikring kan begynde at fungere i løbet af foråret 1992.

Landsstyret har ved nedsættelse af udvalget forudsat, at Arbejdsløshedsforsikringen forventes hovedsaglig at ville blive finansieret af arbejdsmarkedes parter.

I denne forbindelse har udvalget allerede nu henledt landsstyrets opmærksomhed på, at med nuværende muligheder for kontant hjælp, jvf. § 9 i forsorgsloven i forbindelse med arbejdsløshed, er det på forhånd klart, at en arbejdsløshedforsikring ikke vil kunne yde tilsvarende høje bidrag til de sikrede.

Forsorgsloven § 9 vil således have nogle uheldige konsekvenser for arbejdstagernes tilslutning til arbejdsløshedsforsikringen, som forventes at blive frivillig.

Landsstyret har derfor anset det for nødvendigt at ændre § 9 således, at man vender tilbage til retstilstanden som var gældende indtil "Lov nr 718 af 18. november 1987", hvor nuværende § 9 blev indført.

§ 2.

Vedrørende den frivillige sikring i dagpengeloven er der i § 24 fastsat at bidragsstørrelsen skal fastsættes således, at de samlede bidrag skal dække 3/4 af udgifterne til den frivillige sikring efter henholdsvis §§ 13 og 14.

Bidraget blev fastsat i 1979, og udgør i dag kun ca. 10-12% af de samlede udgifter. Landsstyret har i oktober 1991 forhøjet bidraget på den måde, at sikrede betaler 40% og landsstyret yder tilskud på 35%. Dette har man set sig nødsaget at gøre, for at undgå en helt urimelig forhøjelse af bidragsstørrelsen.

Efter den danske dagpengelov udgør bidraget fra de frivillige sikrede kun 40%, og er det Færøernes Landsstyrets ønske, at den færøske lov justeres i overensstemmelse hermed.

Såfremt denne ændring ikke kan gennemføres, må det befrygtes, at den frivillige sikring bortfalder på grund af manglende tilslutning samt masseudmeldelser.

Økonomiske konsekvenser (ad§§ 1 og 2):

Siden 1989 har der været en kraftig stigning af antallet af kontanthjælp p.g.a. arbejdsløshed 18.2 mio. kr. I 1991 har der yderligere været en kraftig stigning, og har Almannastovan anslået, at udgiften i 1991 kommer op på 50 mio. kr.

Statskassen refunderer 25% af denne udgift, og må statens andel i 1991 derfor påregnes at blive ca. 12,5 mio. kr.

Med samme udgiftsniveau i 1992 som i 1991, er konsekvenserne af, at den foreslåede ændring i forsorgsloven § 9 gennemføres, og under forudsætning af at

en arbejdsløshedsforsikring samtidig indføres, at denne vil medføre en besparelse på ca 76%, svarende til en besparelse for staten på 9,5 mio. kr. i 1992 på årsbasis.

Lovændringen i § 9 i forsorgsloven vil således betyde en besparelse for statskassen.

Vedrørende ændringen i dagpengeloven vil denne derimod medføre forøget refusion fra statskassen, idet der i henhold til § 25 i dagpengeloven er bestemt, at staten refunderer 25% af landsstyrets socialforvaltnings udgifter til dagpengeordningen efter fradrag af indtægterne fra de frivillige sikringer.

De samlede udgifter til den frivillige sikring efter henholdsvis §§ 13 og 14 er for 1992 anslået til ca. 9 mio. kr.

En bidragsstørrelse svarende til 3/4 af bruttoudgifterne, vil give en indtægt fra de frivillige sikrede på ca. 6,6 mio. kr. Statens refusion er således 25% af 9.0 -3,5 mio. kr. eller 5,5 mio. kr., svarende til ca. 1,4 mio. kr.

Denne lovændring betyder således en forøgelse af statens udgifter på dette område på (1,4 ÷ 0,6) ca. 0,8 mio. kr.

I aftale af 9. marts 1987 mellem regeringen og Færøernes Landsstyre vedrørende tilskudsreformen er der under pkt. 6 bestemt, at såfremt landsstyret ønsker at forhøje satser m.v. på refusionsområdet, kan dette ske mod kompenserende besparelser i andre refusionsområder.

Merudgifterne ved den foreslåede ændring i dagpengeloven, modsvares af de kompenserende besparelser ved den forestående ændring i forsorgsloven, og lovforslaget må i sin helhed betegnes som en betydelig besparelse for statskassens vedkommende.

§ 3.

Det er for Færøernes Landsstyre af stor betydning, at ændringen i § 9 i forsorgsloven først træder i kraft fra det tidspunkt, hvor arbejdsløshedsforsikringen er blevet en realitet.

Derfor foreslås, at socialministeren bemyndiges til at fastsætte tidspunktet for lovens ikrafttræden, evt. efter nærmere forhandlinger med Færøernes Landsstyre.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 17/1991: Ígildisseðil av "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 3. oktober 1991 og undir 1. viðgerð 1991 beint í Almanna- og Heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fundir við avvarðandi landsstýrismann og umboðið fyri Almannastovuna og formannin í bólkinum, ið arbeiðir við málinum um arbeiðsloysistrygging.

Av viðmerkingum landsstýrisins framgongur, at lógaruppskotið inniber tvær høvuðsbroytingar. Tann fyrsta er § 9 í forsorgarlógini og hin er § 24 í dagpeningslógini. Broytingin í § 9 hongur neyvt saman við eini komandi arbeiðsloysistrygging.

Fyri at Almannastovan ikki skal gerast ein kappingarneyti hjá eini arbeiðsloysistrygging, verður uppheddin, ið goldin verður í arbeiðsloysistuðli eftir forsorgarlógini lækkað til hægst fólkapensjónina, sum t.d. í dag er fyri eina stakan kr. 4.462,- . Harafrat kemur barnatilskot kr. 623,- fyri hvørt barnið.

Viðgerðin í umsitingini av uppskotinum um arbeiðsloysistrygging er ikki liðug enn. Undir viðgerðini í nevndini vóru ymiskar upplýsingar latnar nevndini.

Nevndin er samd um at seta fram soljóðandi.

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at taka upp aftur arbeiðið um at endurskoða alla sosialu lóggávuna, sum áður er sett nevnd til, og sum enn ikki tykist at vera komið burtur úr.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Sverre Midjord og Mikkjal Sørensen) metir út frá útvegaðum upplýsingum, at ætlaða arbeiðsloysistryggingin verður ein nøktandi skipan á avvarðandi øki, og mælir nevndi meirilutti tí til at samtykkja uppskot landsstýrisins við fyrivarni av, at ætlaða arbeiðsloysistryggingin verður góðtikin av løgtinginum.

Hin minniluti (Lisbeth L. Petersen og Asbjørn Joensen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um broytingar í ávikavist dagpeningslógini § 24 og forsorgarlógini § 9 í sambandi við ætlaða arbeiðsloysistryggingarskipan.

Minnilutin tekur undir við, at arbeiðsloysistrygging verður sett í verk, og at arbeiðsávísing verður skipað samstundis, so tað í framtíðini skal loysa seg at taka ímóti arbeiði.

Hinvegin má ásannast, at ætlaða skipanin verður eitt stórt aftурstig fyri tey lægst løntu, um tey gerast arbeiðsleys, eins og fyri tey, ið ikki hava havt arbeiði í longri tíð.

Hesi verða verri fyri, um broytingin í forsorgarlógini § 9 verður samtykt og sett í verk.

Fólk kunnu í dag fáa upp til 80% av vanligari arbeiðsmannaløn í hjálp eftir forsorgarlógini, og hesi 80 prosentini røkka ikki til dagin og vegin hjá nógvum barnafamiljum, sum nú er.

Sambært arbeiðsloysistryggingarskipanini kunnu fólk fáa upp til 70% av lønini útgoldið, og er hetta bert galdandi í avmarkað tíðarskeið. Tey, sum av einihvørjari orsøk ikki hava tryggjað seg, tá útgoldið verður eftir nýggju skipanini, og sum longu eru arbeiðsleys, fáa bert ein part av tí, sum møguligt er at fáa í dag, tá hjálpin eftir forsorgarlógini § 9 verður lækkað.

Samanumtikið verða øll, ið hava hjálp fyri neyðini, verri fyri, og hetta er óhugnaligur veruleiki, nú arbeiðsloysið økist fyri hvønn dag. Eisini vísir minnilutin á, at uppskot um arbeiðsloysistrygging, sum longu skal setast í verk í 1992, enn ikki er viðað framlagt, so løgtingið kann gera sínar viðmerkingar, ella andstøðan fáa ávirkan á uppskotið, nú komið er út í hálvan desembur. Ætlan landsstýrisins má tí vera, at málið skal skundast ígjøgnum.

Minnilutin kann taka undir við broytingini í dagpeningalógini § 24, ið er partur av uppskoti landsstýrisins, tí galdandi reglur sambært lógini ikki verða fylgdar.

Báðar broytingarnar, ið skotnar verða upp, hava samband við fráboðaðu arbeiðsloysistryggingarskipanina, men áttu at verið viðgjørdar hvør sær og ikki undir einum, tá talan her er um broytingar í tveimum ymiskum lógum.

Minnilutin tekur tí undir við tí parti av uppskotinum, sum snýr seg um broyting í dagpeningalógini § 24, men kann ikki taka undir við broytingini í forsorgarlógini § 9, so leingi fráboðaða uppskotið um arbeiðsloysistrygging ikki er framlagt ella viðgjørt. Minnilutin kann tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, so leingi §§ 1 og 2 í uppskotinum verða viðgjørdar undir einum.

18. Broytingar í løgtingslóg um upphøggingarstuðul

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um upphøggingarstuðul.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 46 frá 30. mars 1990 um upphøggingarstuðul verður gjørd hesa broyting:

§ 6 verður broytt til: "Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd."

§ 2.

Hesa løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagingslov om ophørsstøtte.

§ 1.

I lagtingslov nr. 46 af 30. marts 1990 om ophørsstøtte foretages følgende ændringer:

§ 6 ændres til: "Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

§ 2

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar

Politiska endamálið við upphøggingarlógini var, at fiskifør, sum fingu hesa stuðul, ongantíð skuldu koma upp í aftur fiskiskapin undir Føroyum ella fiska burtur úr kvotum, sum føroyskir myndugleikar samráða seg fram til. Stuðul skuldi bert játtast 2 ár og tí varð lógin sett at fara úr gildi 31. december 1991.

Við hesi broyting verður tryggjað, at ásetingin um, at skipini eru burtur úr fiskiflotanum, eisini heldur eftir 31. desember 1991.

Møguleikin at játta stuðul eftir upphøggingarlógini dettur burtur, tá eingin játtan er sett á fíggjarlógina fyri 1992.

19. Viðvíkjandi studningsveitingum

Uppskot

til

samtyktar

I

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at studningsveitingarnar galdandi áðrenn 1. oktober 1991 verða galdandi árið út.

II

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðugt stig til, at manningarstudningurin hjá línumonnum galdandi áðrenn 1. oktober 1991 verður galdandi árið út.

Viðmerkingar

Ljóðað hevur, at studningsveitingarnar eftir 1. oktober 1991 fóru at lækka eini 30%. Grundgevingin hevur verið, at játtanin á fíggjarlógini skuldi haldast og tí varð neyðugt við hesum stóra niðurskurði.

Manningarstudningurin kemur, sum skilst, at lækka við eini 20%, og merkir hetta, at talan verður um ein beinleiðis løgarniðurskurð hjá teim, ið royna við línu.

Hetta kann ikki metast rímiligt, tá hugsað verður um vána fiskiskapin við línu seinastu tíðina, og at manningin við línuskipum einki hevur at missa av.

At játtanir á fíggjarlógum skulu haldast, er ein góður setningur í sær sjálvum, men í samband við niðurskurðin í studningsveitingunum kemst ikki uttan um, at politiski myndugleikin átti at havt eina betri fíggjarstýring av § 16, og sostatt hevur fulla ábyrgd av, at ein ávísur bólkur av lønmóttakarunum nú skal skerjast við heilum 20%. Tað kann ikki vera rætt, ei heldur rímiligt, at fiskimaðurin og fiskivinnan skulu vera tey fyrstu at merkja avleiðingarnar av, at "játtanir á fíggjarlógini skulu haldast", tá hugsað verður um, at meirnýtsla á øðrum kontu á fíggjarlógini uttan stórvegis hávasták verður góðtikin, tá landskassaroknskapurin fyri avvarðandi fíggjarár fyriliggur.

Bakvent tykist tað eisini, at nú marknaðarprísurin er fallandi, verður avgerð tikin um at lækka studningsveitingarnar við heili 30%. Studningsveitingarnar og marknaðarprísurin átti at verið hvørt eftir øðrum.

Nú vaknað verður við kaldan dreym og "upphæddin nærum er uppbrúkt", átti landsstýrið at tikið avleiðingarnar av hesum, ásannað sítt mistak og latið stud-

ningsveitingarnar verða óbroyttar árið út. Í minsta lagi átti manningarstudningurin til línumenn at verið óbroyttur og við bert lítlum vilja, kann hetta lata seg gera, tá tørvandi upphædd fyri hesum árið út bert verður 1,5 - 2 mió. kr.

Loksins verður víst til skriv frá Føroya Fiskimannafelag hesum viðvíkjandi.

Álit

I

Løgtingsmáli nr. 19/1991: Viðvíkjandi studningsveitingum.

Málið er lagt fram av Tordi Nielsen, løgtingsmanni, tann 7. oktober 1991 og undir 1. viðgerð 7. november 1991 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Heimildin at áseta prísískoyti og rakstrar- og manningarstudningar er hjá landsstýrinum saman við Fiskivinnunevndini. Vísast kann á løgtingslóg nr. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til ráfisk, har § 1, stk. 1 er soljóðandi: "Heimilað verður einum meiriluta av samlaða limatalinum í landsstýrinum við góðkenning av einum meiriluta av samlaða limatalinum í Fiskivinnunevnd Løgtingsins at veita skipara, manning á og eigara av føroyskum fiskifari prísískoyti pr. kg. fyri tann ráfisk, fiskifarið hevur veitt og avreiðir til føroyskt fiskavirki til virkingar." Eisini § 1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 110 frá 3. august 1990 um eyka rakstrar- og manningarstudning hevur sama orðaljóð heimildini viðvíkjandi.

Tá landsstýrið, við góðkenning av Fiskivinnunevndini, hevur ásett prísískoyti og rakstrar- og manningarstudningar fyri tíðarskeiðið, uppskotið snýr seg um, er nevndin samd um einki uppskot at seta fram.

20. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Uppskot

til

Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4 a, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Við gildi frá 18. januar 1991 er hinum skattskyldugu loyvi at draga frá í útroknaða landsskattinum í mesta lagi 28% av 60.000 kr.- skattskyldug hjún, sum búgva saman, tó í mesta lagi 28% av samanløgdum 120.000 kr. - av rentum av privatari skuld og útreiðslum til provisjón, stovningarprovisjón ella premiu í sambandi við privata lántøku, sum avtalað er 18. januar 1991 ella seinni, til keyp ella bygging av egnum bústaði, til umvæling og um bygging av egnum bústaði, til útbúgving og lán til gjalding av ábyrgd sambært § 33, nr. 2) í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum."

2) Sum nýggj § 4 h verður sett:
"Av innistandandi á bók í føroyskum peningastovni, sum er latin

Ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændringer:

1) § 4 a, stk. 1 affattes således:
"Med virkning fra 18. januar 1991 kan den skattepligtige fratrække renter af privat gæld og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med privat låntagning, som er aftalt 18. januar 1991 eller senere, til køb eller opførelse af egen bolig, til istandsættelse og ombygning af egen bolig, til uddannelseslån og lån til betaling af afgiven kaution i henhold til § 33, nr. 2) i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer i den udregnede landsskat med højst 28% af 60.000 kr. samlevende ægtefæller dog med højst 28% af sammenlagt 120.000 kr."

2) Som ny § 4 h indsættes:
"Af indestående på indskudsbog i færøske pengeinstitutter, der er

sum handveð áðrenn 18. januar 1991 fyri lán ella ábyrgd sambært § 33, nr. 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, verður renta av inntstandandi upphædd ájøvn við tí til eina og hvørja tíð kravdu trygd, ikki at rokna upp í tær rentuinntøkur, sum nevndar eru í § 4 og § 4 a í hesi løgtinglóg.

handpantsat før 18. januar 1991 for lan eller kaution i henhold til § 33, nr. 2 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere aendringer skal rente af indestaende beløb pa storrelse med den til enhver tid fordrede sikkerhedsstillelse, ikke medregnes i de renteindtægter, som er nævnt i § 4 og § 4 a i denne lagtingslov.

§ 2.

Hendla løgtingslóg kemur í gildi.....

Samstundis fer úr gildi § 2, stk. 2, í løgtingslóg nr. 22 frá 24. apríl 1991 um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft .....

Samtidig ophæves § 2, stk. 2 i lagtingslov nr. 22 af 24. april 1991 om aendring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

Viðmerkingar

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broyting í ásetingarlógini saman við uppskoti til líknandi broytingar í skattalógini eru nakrar broytingar í rentufrádráttarreglunum, sum vórðu settar í gildi við løgtingslóg nr. 22 og 23 frá 24. apríl í ár.

Ætlanin er, at rentufrádráttur in fyri lán í samband við egnan bústað ikki beri skal umfata bygging og keyp av egnum bústaði, men eisini tað eftirliggjandi viðlíkahaldið av bústaðnum, sum vanliga er neyðugt fyri at halda bústaðin nøkulunda í sama standi og virði, sum upprunaliga. Men ætlanin er harumframt, at møguleg lántøka í samband við umbygging, nútímansgerð o.s.fr. av egnum bústaði eisini skal vera rentufrádráttarheimilað.

Hesar broytingar av rentufrádráttinum av lántoku í samband við egnan bústað verða mettar neyðugar fyri at tryggja, at ikki skal vera misjavni í rentufrádráttarrættinum, alt eftir um fólk nýliga hava keypt ella keypa eini nýggj ella gomul hús, ella um fólk nýliga hava bygt ella búgva í húsum, sum hava umvæling fyri neyðini. Endamálið við lógarbroytingunum fyrr í ár, nevnilega at avtaka rentufrádrátt fyri nýggj nýtslulán ávirkast av hesum ætlaðu broytingum, og tær ásettu hámarksupphæddirnar fyri loyvdan rentufrádrátt uppá ávikavist 1.200.000 kr. fyri hjún og 600.000 kr. fyri støk, verða boldur ikki broyttar av hesum, men koma fram vegis at standa sum avmarking av rentufrádráttinum fyri privata lántoku, ið undaða 18. januar 1991 ella seinni, saman við teim avmarkingum, ið fylgja av lánsslagnum.

lagtingslov om aendring af lov om beskatning af pensionsmidler m.v.

§ 1

I lov nr. 1 af 3. januar 1991 om beskatning af pensionsmidler m.v. foretages følgende aendringer:

1. I § 1, stk. 1, nr. 1, 2. pkt., udgaar "og § 4 a".

2. I § 1, stk. 1, nr. 2, 2. pkt., udgaar "og § 4 a".

3. I § 1, stk. 1, nr. 3, 2. pkt., udgaar "og § 4 a".

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 4 a:
Her verður rentufrádráttarin fyri privat lán, avtalað 18. januar 1991 ella seinni, broyttur, so hann nú eisini fevnir um umvæling av keyptum gomlum húsum, um ásettu treytirnar, um aldurin á húsunum og at lántakan skal vera innan ásetta tíð, eru loknar.

Til nýggju § 4 b:
Ásetingin í § 2, stk. 2 í løgtingslóg nr. 22 frá 24. apríl 1991 um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, verður her førd inn í sjálvan lógartekstin í løgtingslógini um áseting av skatti til landskassan. Samstundis verður gjørd tann avmarking, at talan bert verður um rentu av tí innistandandi upphæddi í føroyskum peningastovni, ið veruliga tænir sum trygd, sum ikki skal teljast til tær rentuinntøkur til mótrokning, sum annars ásett í § 4 og § 4 a. Renta av upphæddi, større enn kravda trygdin, er renta av peningi, ið ikki er bundin av veðsetingini, og skal hendan rentan tí teljast við í rentuinntøkuna hjá viðkomandi til mótrokning eftir rentumótrokningareglunum.

Álit

í

Løgtingsmálunum nr. 20/1991: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan og nr. 21/1991: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málini vóru løgd fram av landsstýrinum tann 7. oktober 1991 og vórðu við 1. viðgerð tann 9. oktober 1991 beind í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjort málini og fingið tá frágreiðing frá landsstýrismanninum í skattamáltum, at endamálið við uppskotinum er at útgreina og nágreina tær broytingar, sum gjordar vórðu í skattlóggávuni í vár. Hesar broytingar byggja á tær royndir, sum bæði skattaumsitingin og ráðgevarar hjá skattaborgarum hava gjørt í sambandi við brúk av teimum nýggju reglunum higartil.

Talan er í fyrsta lagi um at gera reglurnar viðvíkjandi uppgerðini av javnaða eginpeningarnum hjá felagum greiðari og við hesum lættari at umsita og arbeiða eftir.

Í øðrum lagi er talan um at broyta reglurnar viðvíkjandi frádrátti av privatum rentum, so at møguligt verður eisini at draga privatar rentuútreiðslur frá av lánum, sum tikin verða til umvæling og viðlíkahald av húsaði. Frammanundan er

einans loyvt at draga renturnar frá, um tær stava frá láni, sum er tikið til útvegan av bústaði. Hámarkið og aðrar avmarkingar, sum gjørdar vóru í vár, verða tó framvegis galdandi.

Í triðja lagi er talan um at broyta regluna um rentu av innistandandi peningi, sum er veitt sum trygd fyri ábyrgdarláni. Skotið verður upp at avmarka hesa reglu soleiðis, at tað framyvir einans verður tann parturin av rentuinntøkuni, sum svarar til ta kravdu trygdina, sum ikki skal teljast uppí rentuinntøkurnar, tá nettorentan skal útroknast.

Skattanevndin tekur undir við uppskotum landsstýrisins, men mælir tit at seta nágreiniligar reglur um ígildissetan av broytingunum.

Hvat løgtingmáli nr. 20/1991 viðvíkur setir nevnd fram soljóðandi

broytingaruppskot

§ 2 verður orðað soleiðis:

"Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1992, tó verður pkt. 1) galdandi frá 18. januar 1991. Samstundis fer úr gildi § 2, stk. 2 í løgtingslóg nr. 22 frá 24. apríl 1991 um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landsskassan".

§ 2 affattes således:

"Denne lov træder i kraft 1. januar 1992, dog gælder pkt. 1) fra 18. januar 1991 at regne. Samtidig ophæves § 2, stk. 2 i lagtingslov nr. 22 af 24. april 1991 om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen".

Hvat løgtingsmáli nr. 21/1991 viðvíkur setur nevndin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

§ 2 verður orðað soleiðis:

"Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1992, tó verða pkt 2), 3), 4) og 5) galdandi frá 18. januar 1991. Samstundis fer úr gildi § 2, stk. 2 í løgtingslóg nr. 23 frá 24. apríl 1991 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt".

§ 2 affattes således:

"Denne lov træder i kraft 1. januar 1992, dog gælder pkt. 2), 3), 4) og 5) fra 18. januar 1991 at regne. Samtidig ophæves § 2, stk. 2 i lagtingslov nr. 23 af 24. april 1991 om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat".

21. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Uppskot

til

Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskat.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 5 verður orðað soleiðis

"Er tann í stk. 4 nevnda ogn innistandandi í føroyskum peningastovnum ella postgiro, skal rentuinntøkan av hesi ogn verða løgd saman við rentuinntøkuni hjá gevaranum, tá ið nettorentufrádráttur verður gjørdur upp eftir §§ 33, nr. 1), 46 og 46 a í hesi løgtingslóg og §§ 4 og 4 a í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum. Reglan í 1. pkt. er eisini galdandi, um gevarin er omma ella abbi at barninum."

2) § 33, nr. 1 a verður orðað soleiðis:

"rentuútreiðslur av íløgu og rakstrarskuld í sambandi við vinnuvirki og útreiðslur til provisjón, stovningarprovisjón ella premiu í sambandi við lántøku ella ábyrgd til vinnuvirki við frádrátti av rentuinntøku av innistandandi í føroysk-

Ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 5. stk. 5 affattes således:

"Er den i stk. 4 nævnte formue indestående i færøske pengeinstitutter eller postgiro, skal renteindtægten af denne formue medtages i renteindtægten hos giveren i forbindelse med beregningen af nettorentefradraget i henhold til §§ 33, nr. 1), 46 og 46 a i denne lagtingslov og §§ 4 og 4 a i lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer. Bestemmelsen i 1. pkt. er også gældende hvor giveren er et af barnets bedsteforældre.

2) § 33, nr. 1 a affattes således:

"renteudgifter af investerings- og driftsgæld i forbindelse med erhvervsvirksomhed og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med optagelse af lån eller afgivelse af kaution til erhvervsvirksomhed med fra-

um peningastovni og postgiro hjá partafelag, lutafelag og øðrum skattskyldugum feløgum. Rentuútreiðslurnar v.m. skulu minkast við teirri upphædd, sum rentuinntøkan av innistandandi peningi í føroyskum peningastovni og postgiro er størri enn ein upphædd, sum svarar til rentur av javnaða eginpeningi felagsins, jfr. § 33, nr. 1b).

drag af renteindtægt af indestående i færøske pengeisstitutter og postgiro hos aktieselskab, andelsselskab og andre skattepligtige selskaber. Renteudgifterne m.v. skal reduceres med det beløb, renteindtægten af indestående i færøske pengeinstitutter og postgiro overstiger et beløb, som svarer til renter af reguleret egenkapital i selskabet ved indkomstårets begyndelse, jfr. § 33, nr. 1 b).

3) Í § 33, nr. 1 verður sum nýtt nr. 1 b sett:

"Við javnaða eginpeningi felagsins sambært litra 1 er at skilja bókaði eginpeningurin javnaður fyri: fløgugrunnar, rakstrargrunnar, klassingargrunnar, upp- og niðurskrivingar, ikki ásannaðum kursmuni, fyri munum á skattligum og roknskaparligum saldi á avskrivingarbærum ognum, frádrátt fyri tí skatti, sum áliggur felagnum av rakstrartúrslitinum, og tí vinningsbýti, ið skal gjaldast partaeigarunum."

3) I § 33, nr. 1 indsættes som nyt nr. 1 b:

"Med den reguleredе egenkapital efter litra a skal forstås den bogførte egenkapital reguleret for investeringsfonds, driftsfonds, klassifikationsfond, op- og nedskrivninger, ikke konstateret kursdifference, difference på de regnskabsmæssige saldi på afskrivningsberettigede aktiver, fradrag af årsresultatets skat og det udbytte, som skal udbetales til aktionærerne."

4) Í § 33, nr. 1 verður sum nýtt nr. 1 c sett:

"Líkningarráð Føroya áseting tí í litra a nevndu rentu 1. januar galdandi fyri tað roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum frammanundan, fyrstu ferð galdandi fyri tað roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í 1991. Rentuútreiðslur v.m. kunnu hægst verða minkaðar til 0 kr. Í rentuinntøkuni, sum

4) I § 33 nr. 1 indsættes som nyt nr. 1 c:

"Færøernes Lagtingsråd fastsætter den i litra a nævnte rentesats 1. januar, gældende for den regnskabsperiode, der falder sammen med eller slutter i det foregående kalenderår, første gang med virkning for den regnskabsperiode, der falder sammen med eller slutter i 1991. Renteudgifterne m.v. kan højst reduceres til 0 kr. Renteskat i

nevnd er í litra a, skal rentuskattur sambært løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum og innistandandi peningi í føroyskum peningastovnum og postgiro við seinni broytinum verða drigin frá."

5) § 46 a verður orðað soleiðis:

"Við gildi frá 18. januar 1991 er hinum skattskylduga loyvt at draga frá í útroknaða kommunuskattinum í mesta lagi 14% av samanløgdum 120.000 kr. - av rentum av privatari skuld og útreiðslum til provisjón, stovningarprovisjón ella premiu í samband við privata lántøku, sum avtalað er 18. januar 1991 ella seinni, til keyp ella bygging av egnum bústaði, til umvæling og umbyggin av egnum bústaði, til útbúgving og til gjalding av ábyrgd sambært § 33, nr. 2) í hesi Løgtingslóg."

6) Sum nýggj § 46 b verður sett:

"Av innistandandi á bók í føroyskum peningastovni, sum er latin sum handveð áðrenn 18. januar 1991 fyri lán ella ábyrgd sambært § 33, nr. 2 í hesi lógtingslóg, verður renta av innistandandi upphædd ájøvn við tí til eina og hvørja tíð kravdu trygd, ikki at rokna upp í tær rentuinntøkur, sum nevndar eru í § 5, stk. 5 og stk. 6, § 33, nr. 1 og nr. 1 a og b, § 46 og § 46 a í hesi løgtingslóg.

henhold til lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indkomstskat af renter af indestående kapital i færøske banker og sparekasser med senere ændringer skal være fratrukket de i litra a nævnte renteindtægter."

5) § 46 a affattes således:

"Med virkning fra 18. januar 1991 kan de skattepligtige fradrag renter af privat gæld og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med privat låntagning, som er aftalt 18. januar 1991 eller senere, til køb eller opførelse af egen bolig + til istandsætning og ombygning af egen bolig, til uddannelseslån og lån til betaling af afgiven kaution i henhold til § 33, nr. 2) i denne lagtingslov i den udregnede kommuneskat med højst 14% af 60.000 kr. - samlevende ægtefæller dog med højst 14% af sammenlagt 120.000 kr."

6) Som ny § 46 b indsættes:

"Af indestående på indskudsbog i færøske pengeinstitutter, der er håndpantsat før 18. januar 1991 for lån eller kaution i henhold til § 33, nr. 2 i denne lagtingslov skal rente af indestående beløb på størrelse med den til enhver tid fordrede sikkerhedsstillelse, ikke medregnes i de renteindtægter, som nævt i § 5, stk. 5 og stk. 6, § 33, nr. 1 og nr. 1 a og b, § 46 og § 46 a i denne lagtingslov.

§ 2.	§ 2.
Henda løgtingslóg kemur í gildi.....	Denne lagtingslov træder i kraft...
Samstundis fer úr gildi § 2, stk. 2 í løgtingslóg nr. 23 frá 24. apríl 1991 um broyting í Løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	Samtidig ophæves § 2, stk. 2 i lagtingslov nr. 23 af 24. april 1991 om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

Viðmerkingar

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broyting í skattalógini, saman við uppskoti til somu líknandi broytingar í ásetingarlógini, eru nakrar broytingar í rentufrádráttarreglunum, sum vórðu settar í gildi við løgtingslóg nr. 22 og 23 frá 24. apríl í ár.

Ætlanin er, at rentufrádrátturin fyri lán í samband við egnan bústað ikki bert skal umfata bygging og keyp av egnum bústaði, men eisini tað eftirliggjandi viðlíkahaldi av húsunum, sum vanliga er neyðugt, fyri at halda bústaðin í sama standi og virði sum upprunaliga. Men harumframt er eisini ætlanin, at nøgulig lántøka í samband við eina umbygging, nútímansgerð o.s.fr. av egnum bústaði eisini skal verða rentufrádráttarrættigað.

Hesar broytingar av rentufrádráttinum í samband við egnan bústað, verða mettar neyðugar fyri at tryggja, at ikki skal verða misjavni í rentufrádráttarrættinum, alt eftir um fólk hava keypt, ella keypa eini nýggj ella gomul hús, ella um fólk nýliga hava bygt ella búgva í húsum, sum hava umvæling fyri neyðini.

Endamálið við lógarbroytingunum fyri í ár, nevniliga at avtaka rentufrádráttin fyri nýggj nýtslulán, ávirkast ikki av hesum broytingum, og tær ásettu hámarksupphæddir upp á 120.000 kr. í rentufrádrátti fyri hjún, ið búgva saman, og 60.000 kr. fyri stakan skattgjaldara, verða heldur ikki broyttar, men fara framvegis at standa sum avmarkingin av rentufrádráttinum fyri privata lántoku, avtalaða 18. januar 1991 ella seinni saman við teim avmarkingum, ið fylgja av lánsslagnum.

Tað hevur eisini eftir lógarbroytingini í vár, víst seg at vera neyðugt við neyvari útgreining av, hvat skal íroknast eginognina, tá skattaði eginpeningurin hjá einum felag skal uppgerast eftir reglunum fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku sambært núgaldandi § 33, nr. 1 a í skattalógini. Tvin hevur eina mest staðið um ávikavist rentuinntøku av innistandandi í føroyskum peningastovni og postgiro, latið og fingið vinningsbýti og goldnan ella avsettan skatt. Í broytingaruppskotinum verður nú fastaðin skotið upp, at nýta javnaða eginpening felagsins til uppgerð av eginognini við neyvari áseting um, hvat er at skilja við "javnaða eginpening felagsins".

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 5, stk. 5:

Henda regla, sum er ætlað at tryggja, at persónar ikki kunnu fara uttanum reglurnar um avmarking í rentufrádráttarrættinum á tann hátt, at foreldur sjálv standa fyri lánum, men lata teirra innistandandi pening standa í navni hjá børnunum, verður her broytt frá fyrr, bert at umfata peningaflutning frá foreldrum til børn, nú eisini til at umfata peningaflutning frá ommum og abbum til ommu- og abbabørn. Persónskreðsurin verður soleiðis víðkaður.

Til § 33, nr. 1 a, b og c:

§ 33, nr. 1 a verður her samstudis, sum greinin verður nakað broytt, eisini býtt upp í punktini a, b og c.

Viðvíkjandi uppgerð av eginognini verður í § 33, nr. 1 a skotið upp, at í staðin fyri at nýta skattaða eginpening felagsins uppgjørdan eftir reglunum fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku, skal verða talan um javnaða eginpening felagsins.

Í nr. 1 b er ásett, at javnaði eginpeningur felagsins er at skilja sum tann bókaði eginpeningur felagsins javnaðar fyri fløgugrunnar, rakstrargrunnar, klassingargrunnar, upp- og niðurskrivingar av ogn felagsins, ikki ásannaðum kursmuni, fyrimunum á skattligum og roknskaparligum saldi á avskrivingarbærum ognum, og skatti, ið áliggur felagnum av rakstrarúrslitinum, og vinningsbýti til partaeigarar.

Eftir núgaldandi orðing, skal renta av innistandi peningi í føroyskum peningastovnum ikki roknast við sum eginpeningur. Eftir fyriliggjandi uppskoti verður henda renta roknað við til eginpeningin. Tað samt er galdandi fyri vinningsbýti.

Goldin skattur skal sambært núgaldandi § 33, nr. 1 a leggjast aftrat eginognini, meðan hann eftir hesum uppskotinum ikki verður lagdur aftrat eginognini.

Skattafrírur søluvinningur skal sum er, ikki roknast eginognini, men verður eftir hesum uppskoti ítaldur tí javnaðu eginognini.

Til § 46 a:

Her verður rentufrádráttarrætturin í samband við lán avtalað 18. januar 1991 ella seinni, víðkaður nakað, so tað eisini verður heimild at draga rentuútreiðslur í samband við privata lántøku til umvæling og umbygging av egnum bústaði frá í útroknaða skattinum, og ikki bert renturnar av lánum til sjálvt keypið ella byggingina av egnum bústaði. Renta av láni til viðlíkahald og annars øll ístandgerð ella broyting av egnum bústaði verður soleiðis frádráttarheimilað eins og tá tikin til keyp og bygging av sjálvum bústaðnum.

Viðmerkjast kann her, at Lívkingarráð Føroya sambært § 46 a, stk. 5 hevur heimild til at áseta nærri reglur viðvíkjandi krøvum til skjalprógv av hesum rentuútreiðslum.

Til § 46 b:

Hetta er ásetingin í § 2. stk. 2 í løgtingslóg nr. 23 frá 24. apríl 1991 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, sum verður førd inn í lógartekstin í skattalógini og samstundis broytt, so at tað bert er renta av tí innistandandi upphædd í føroyskum peningastovnum, ið stendur sum tryggd fyri láni, veittum vinnuvirki, t.v.s tað er bert renta av tí til eina og hvørja tíð kravdu trygd, ið ikki skal teljast við í tí vanligu rentuinntøkuni til mótrokning, sum annars ásett er í § 5, stk. 5 og 6, § 33, nr. 1 og 1 a og b, § 46 a.

Tá lánini verða avdrigin, minkar kravda trygdin samstundis, og verður renta av tí innistandandi upphædd, ið er hægri enn kravd trygd, verður hereftir talд við í rentuinntøkuna hjá viðkomandi til mótrokning eftir rentumótrokningarreglunum. Hetta tí upphæddin, ið er hægri enn neyðuga trygdin, er peningur, ið ikki er bundin av handveðsetingini.

22. Løgtingslóg um japanska fiskivciðu undir Føroyum

Uppskot

til

Løgtingslóg um japanska fiskiveiðu undir Føroyum.

Lagtingslov om japansk fiskeri ved Færøerne.

§ 1.

Landsstýrinum er hóast løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á ytru landleiðini, við seinni broytingum, heimilað at geva japanskum skipum loyvi at veiða á ytru landleiðini. Treyt fyri loyvinum er, at avtala er gjørd við japanskt felag/feløg, og at avtalan er góðkend av marknaðarnevnd løgtingsins.

§ 1.

Uanset bestemmelserne i lagtingslov nr. 8 fra 29. marts 1978 om fiskeri pa det ydre fiskeriterritorium, med senere ændringer, bemyndiges landsstyret til at meddele japanske skibe tilladelse til fiskeri pä det ydre fiskeriterritorium. Det er en betingelse for tilladelsen, at der er indgäet aftale med et japansk

§ 2.

Brot mót reglunum í loyvinum eftir § 1 koma undir bót, og herafturat kann allur fiskireiðskapur, so sum net, lemmar, wirar, línur uppstandarar v.m. og fong ur koma undir konfiskatión. Skipið kann heftast til rindingar av bót og kostnað. Fiskiloyvið kann verða tikið aftur, um førarin av skipinum er skuldsettur fyri brot móti reglunum í loyvinum eftir § 1.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

selskab/selskaber, og at aftalen er godkendt af lagtingets markedsudvalg.

§ 2.

Overtrædelse af reglerne i tilladelser i henhold til § 1 straffes med bøde, hvorhos samtlige fiskeredskaber, herunder net, lemme, slæbetrosser, liner, opstandere m.v. og fangst kan konfiskeres. Skibet kan beslaglægges til dækning af bøde og omkostninger. Fiskeritilladelsen kan tilbagekaldes, såfremt føreren af skibet er sigtet for overtrædelse af reglerne i tilladelsen i henhold til § 1.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar

Áhugi er hjá japanskum felløgum at fáa skip at veiða svartkjaft undir Føroyum og framleiða surimi úr hesum. Føroyar hava ikki fiskiavtalu við Japan, og tískil má løgtingslóg gerast, ið heimilar landsstýrinum at geva japanskum skipum loyvi at veiða á ytru landleiðini við teirri treyt, at avtala er gjørd við japanskt felag. Avtalan skal vera góðkend av marknaðarnevnd løgtingsins.

Á henda hátt ber til at loyva japanskum skipum at royndarveiða eftir svartkjafti ella øðrum fiskasløgum undir Føroyum. Nærri verður ásett í avtalunni um veiðunøgd, tal av skipum og aðrar treytir – eitt nú føroyskur eygleiðari er umborð, og at upplýst verður um fiskiveiðuna, framleiðsluna og søluarbeiðið. Skipini skulu halda tær lógir og reglur, ið galda fyri fiskiskap á føroyskum fiskiøki.

Samband við japanskt framleiðslutøkni og japanskan marknað má vera góður stuðul til at fáa nýtt svartkjaftatilfeingið skilagott.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 22/1991: Løgtingslóg um japanska fiskiveiðu undir Føroyum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 9. oktober 1991 og undir 1. viðgerð 31. oktober 1991 beint í Marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin mælir til, at tær treytir, sum settar verða í loyvið, eru í minsta lagi ikki linari enn tær treytir, sum føroyingar arbeiða undir í fiskiøki hjá øðrum londum. Her verður hugsað um t. d.:

Eygleiðarar (ikki minni enn 2 á hvørjum skipi, ein kønan fiskimann og ein kønum framleiðslumann (teknolog).

Veiðinøgd - Avgjald - Hjáveiða - Avmarking í leiðum - Avmarking í nøgd - Avmarking í skipatali Umskiping.

Eisini eigur at hugsast um, hvussu hetta so vítt gjørligt kemur framleisluni á landi til góðar.

Loyvið eigur eisini bert at verða givið til royndarfiskiskap og ikki vanligan fiskiskap.

Víst verður annars til galdandi kunngerðir um veiðu eftir svartkjafti við skipum úr øðrum londum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein sand nevnd undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

23. Løgtingslóg um lán til Strandfaraskip Landsins

Uppskot

til

Løgtingslóg um lán til Strandfaraskip Landsins.

§ 1.

Strandfaraskipum Landsins verður heimilað at læna upp til 10 mió. kr. til fígging av rakstrinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om lån til Strandfaraskip Landsins.

§ 1.

Strandfaraskip Landsins bemyndiges til at låne op til 10 mio. kr. til finansiering af driften.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Sum er, hevur Strandferðslan ikki heimild til at taka rakstrarlán, sum t.d. Telefonverk Føroya Løgtings hevur við løgtingslóg nr. 13 frá 25. mars 1981 við seinni broyting.

Við tí rakstrarmynstri sum er, slepst ikki undan, at yvirtrekk av og á verða á konti, sum peningastovnarnir rokna sær morarentu fyri, av tí at Strandfaraskip Landsins hava eitt javnt útreiðslumynstur, meðan inntøkurnar eru býttar ójavnt, alt eftir árstíðini.

Hetta, saman við at ein slík fyritøka altíð hevur nakað av skuldarum, ger, at mett verður neyðugt at fíggja hetta við einum rakstrarláni, so sleppast kann undan at gjalda morarentu í framtíðini.

Leggjast kann afturat, at roknskapurin fyri 1990 vísir eina rentuútreiðslu uppá 2,6 mió. kr. til peningastovnarnar; við omanfyri nevndu lániheimild kann upphæddin væntast at verða munandi minni komandi ár.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 23/1991: Løgtingslóg um lán til Strandfaraskip Landsins.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. oktober 1991 og undir 1. viðgerð 31 oktober 1991 beint í fíggjarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Fíggjarnevndin skal fyri góðan ordan skuld viðmerkja, at orðið "morarentu" í viðmerkingum landsstýrisins hevur týdningin av orðinum "yvirtreksrentu".

24. ST-sáttmáli um rættindi hjá børnum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at ST-sáttmáli frá 20. november 1989 um rættindi hjá børnum verður lýstur at galda í Føroyum.

Viðmerkingar

Løgmálaráðið hevur um ríkisumboðsmannin spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at ST-sáttmáli frá 20. november 1989 um rættindi hjá børnum eisini skal fevna um Føroyar.

Sáttmálin hevur fingið gildi fyri Danmark, men er fyrivarni tikið fyri Føroyar. Sáttmálin ger tað ikki neyðugt at gera broytingar í føroyskari lóggávu.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 24/1991: ST-sáttmáli um rættindi hjá børnum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. oktober 1991 og eftir 1. viðgerð 19. november 1991 beint í rættarnevndina.

Við tingmálinum mælir landsstýrið løgtinginum til við uppskoti til samtyktar at góðkenna, at ST-sáttmáli frá 20. november 1989 um rættindi hjá børnum verður lýstur at galda í Føroyum. Sáttmálin hevur fingið gildi fyri Danmark, men er fyrivarni sum vanligt tikið fyri Føroyar. Landsstýrið upplýsir í málinum, at sáttmálin ikki ger tað neyðugt at gera nakrar broytingar í føroyskari lóggávu.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

25. Løgtingslóg um príseftirlit (Løgtingsmál nr. 101/90)

Málið varð upprunaliga lagt fram av landsstýrinum tann 12. apríl 1991 og varð undir 1. viðgerð 18. apríl 1991 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin varð við løgtingssamtykt 23. apríl 1991 gjørd til millumtinganevnd í tingmálinum og álagt varð nevndini at leggja fram álit í ólavsøkutingsetuni 1991.

Málið er eftirhondini eitt rættiliga gamalt mál á tingi. Fyrstu ferð varð málið lagt fyri løgingið í setuni 1987/88, men tá varð málið ikki avgreitt. Síðani varð málið sum longu nevnt lagt fyri tingið av nýggjum, og hevur løgtingsins rættarnevnd síðan havt málið til viðgerðar. Endamálið við lógini er í høvuðsheitunum at forða fyri órímiligum prísum og vinningum, fyri rongum vøruupplýsingum, órímiligum handilstreytum og kappingar av marknaðartiltøkum, tiltøkum, ið kunnu verða brúkarunum og vinnurøkjandi at bága. Lógin fevnir í høvuðsheitinum um allan handil við vørum og allar tænastur fyri gjald - undantikið er tó lønir.

Galdandi príslóg er frá 1987 og hevur Prísráð Føroya sett fram ynski um at fáa lógina endurskoðaða, serstakliga viðvíkjandi reglunum um handilskapping. Lógaruppskotið er gjørt av einum arbeiðsbólki, sum landsstýrið hevur sett at endurskoða lógina um príseftirlit. Í arbeiðsbólkinum hava sitið umboð fyri Brúkarafelagið, Føroya keypmannafelag, Føroya keypsamtøku, Felagið fyri føroysk farmaskip. Um lógaruppskotið sum heild er at siga, at lógin kemur at vera umsitin eins og galdandi lóg av Prísráðnum við kæruatgongd til yvirprísráðið, og at hon, sum longu nevnt fevnir um allan handil við vørum, allar tænastur fyri gjald uttan lønir. Prísráðið hevur tó ikki eftirlit við viðurskiftum, sum eru undir øðrum almennum eftirliti, og kann ikki taka avgerðir um prísir ella gjøld, ið verða ásett ella góðkend av øðrum almennum stovnum.

Í lógini er eisini nærri ásett, hvussu endamálsgreinin eigur at skiljast. Í metingini av, nær ein prísur ella ein vinningur er órímilgur, skal leggjast til grund tær útreiðslur, sum seljarin hevur havt av vøruni. Av rættarpraksis aðrastaðni fylgir, at fulnaður bert kann krevjast fyri vanligar útreiðslur við skilagóðum rakstri. Samanberast kann eisini við marknaðarprísin, tó ikki í førum, tá hesin er høgur vegna vantandi kapping ella vegna óvanliga stóran eftirspurning.

Tað er eisini í lógini nærri ástett, nær ein vørupplýsing skal metast sum rong ella ófullfíggjað m.a. um nær, ið vørur skulu verða prísmerktar, merktar við framleiðsludegi, seinast loyvda søludegi o.s.fr.

Tað er í lógaruppskotinum einki ásett um, nær ið ein handilstreyt er órímilig. Av praksis aðrastaðni kann nevnast, at keypmuður sum treyt fyri sølu av eini trotavøru, setir, at keyparin eisini keypir aðrar vørur (sokallaðar "kablingshandil").

Sjálvt um prísurin er rímiligur, kann tað vera órímiligt at tvinga ein kunda at keypa nakað, ið hesin ikki hevur fyri neyðini.

Tað er heldur einki í lógaruppskotinum ásett um, nær eitt tiltak skal metast sum kappingaravmarkandi. Tað má tó haldast, at fylgja av § 2, stk. 3 og av viðmerkingunum til § 2, at umfatað av lógini eru ikki bert kappingaravmarkandi tiltøk, sum kunnu hava árin á framleiðslu, handils- og flutningsviðurskifti. Kappingin er sum oftast serliga hørð, tá tað snýr seg um prís og vinning. Tá metast skal, um hesir eru ov høgir á økjum, ið kappingaravmarking er praksis aðrastaðni, t.d. í Danmark, at samanbera við teir prísir og við teir vinningar, ið høvdu verið galdandi á marknaðinum við virknari kapping. Prísir og vinningar á økjum, har kappingin er avmarkað, eiga sostatt ikki at fara upp um støðið við virknari kapping. Sambært uppskotinum verður lógin partvíst hildin uppi av forboðum og boðum um viðurskifti við tilknýti til endamálsgreinina (§ 2, stk. 1, og 2, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1, §§ 11 - 13), partvís gjøgnum heimild hjá Prísráðnum at geva forboð og boð um sonu viðurskifti (§ 5, stk. 2, § 7, stk. 3, § 8, stk. 1-3, § 10, § 14, stk. 1), tá talan er um boð um ikki at fara upp um ávísan prís ella vinning, tó bert fyri eitt tíðarskeið upp til 6 mánaðir, og fyrst eftir samráðing við avvarðandi virki ella vinnugrein av felagsskapum. Í § 9, stk. 2 er heimild hjá Prísráðnum at áseta nærri reglur um prísmerking, fakturering av vørum og útgreining av rokningum fyri gjørd arbeiði. Til tess at lætta um eftirlitið hjá Prísráðanum eru eisini ásettar reglur um fráboðanir og upplýsingarskyldur (§ 2, stk. 3-6, § 4 stk. 4). Fyri at gera kappingina meiri virkna er eisini heimild hjá Prísráðnum at almannakunngera prís og prísmunir á týðandi vørubólkum, tó uttan at nevna navn virkisins (§ 4, stk. 2-3). Lógin inniheldur eisini reglur um, at Prísráðið kann taka avgerðir um, at ólóglig úrtøka skal verða drigin frá framtíðarvinningi og um revsing (§ 15 og § 17). Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við skrivaran í Prísráðnum Knút Nolsøe.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

Løgtingslóg um príseftirlit.

§ 1.

Lógin hevur til endamáls at forða fyri órímiligum prísi og vinningi, rongum vøruupplýsingum, órímiligum handils-

Lagtingslov om priskontrol.

§ 1.

Lovens formål er at forhindre urimelige priser og avancer, forkerte vareoplysninger, urimelige forretningsvilkår

treytum og kappingaravmarkandi tiltøkum, ið kunnu vera brúkarum ella vinnurøkjandi at bága.

Stk. 2. Lógin fevnir, bar ikki serlig undantøk verða gjørd, um allan handil við vørum og alla tænastu fyri gjald, lønir undantiknar.

§ 2.

Ikki er loyvt at taka órímiligan prís og vinning ella hava órímilgar handils- og kappingartreytir og kappingaravmarkan, sum kunnu vera brúkarum, vinnurøkjandi ella almennum samfelagsáhugamálum at bága.

Stk. 2. Avtalur, samtyktir og reglur, sum kunnu hava órímiligan prís ella vinning við sær, eru ikki loyvdar.

Stk. 3. Prísráðið skal fáa fráboðan um avtalur og samtyktir, sum hava ella kunnu hava týðandi árin á prís-, framleiðslu-, handils- ella flutningsviðurskifti í landinum øllum ella á avmarkaðum, marknaðarøkjum.

Stk. 4. Prísráðið kann fyri ávísa vøru , tænastu- og flutningsveitingarøki ella fyri einstøk virki fyriseta, at Prísráðið fær fráboðan um prísbroytingar.

Stk. 5. Ídnaðar-, handverks- og handilsvirki, sum fyri vørur, seldar her á landi áseta ella ráða til prís ella vinning fyri søla í eftirfylgjandi søluliði, skulu boða Prísráðnum frá, eisini um broytingar.

Stk. 6. Tær fráboðanir, ið fyriskipaðar eru í stk. 3, 4 og 5, skulu vera givnar

samt konkurrencebegrænsende tiltag, der har skadelige virkninger for forbrugere eller de erhvervsdrivende.

Stk. 2. Loven omfatter, hvor ikke særlige undtagelser er gjort, al handel med varer og alle tjenesteydelser mod betaling med undtagelse af lønninger.

§ 2.

Urimelige priser og avancer samt urimelige omsætnings- og konkurrenceforhold samt konkurrencebegrænsninger, der har skadelige virkninger for forbrugere, erhvervsdrivende eller er til skade for almene samfundsinteresser er forbudt.

Stk. 2. Aftaler, vedtagelser og bestemmelser, som kan medføre urimelige priser og avancer er forbudt.

Stk. 3. Aftaler og vedtagelser, som udøver eller vil kunne udøve en væsentlig indflydelse på prisproduktions-, omsætnings-, eller transportforhold i hele landet eller indenfor lokale markedsområder, skal anmeldes til prisrådet.

Stk. 4. Prisrådet kan for bestemte vare-, tjeneste- og transportydelsesområder eller for enkelte virksomheder foreskrive, at prisændringer skal indberettes til Prisrådet.

Stk. 5. Virksomheder indenfor industri, håndværk og handel, som for salg af varer her i landet fastsætter eller tilkendegiver priser eller avancer for salg i efterfølgende omsætningsled, skal anmelde disse og ændringer heri til prisrådet.

Stk. 6. De i stk. 3, 4 og 5 foreskrevne anmeldelser skal ske inden 8 dage

innan 8 dagar eftir, at avvarðandi avtala ella samtykt er gjørd.

§ 3.

At hava eftirlit við prísum og vinningum og øðrum viðurskiftum, sum eru nevnd í hesi lóg, verður sett eitt prísráð við 3 limum. Landsstýrið velur prísráðið fyri 4 ár. Ein av limunum skal umboða áhugamál brúkaranna, ein áhugamál seljaranna, og triði limurin, sum ikki má vera beinleiðis heftur av framnanfyri nevndu áhugamálum, skal vera formaður. Fyri hvønn av limunum verður valdur varalimur.

Stk. 2. Prísráðið hevur Príseftirlitið at taka sær av dagliga virksemi ráðsins.

Stk. 3. Prísráðið hevur ikki eftirlit við viðurskiftum, sum eru undir øðrum almennum eftirliti hjá landinum ella einari kommunu.

§ 4.

Ráðið skal av sínum eintingum hava eyga við prislagnum og kann kunngera almenninginum prís og prísmun á týðandi vørubólkum, tó uttan at nevna navn virkisins.

Stk. 2. Prísráðið kann kanna prís og vinning hjá teimum einstøku virkjunum.

Stk. 3. Áðrenn tílík kanning, sum nevnd er í stk. 2, verður sett í verk, skal Prísráðið samráðast við virkið um grundarlagið undir kanningunum. Áðrenn úrslitið eftir stk. 1 verður kunngjørt, skal Prísráðið geva virkjum ella felagsskapum, ið hava tilknýti til kanningina, høvi at gera viðmerkingar til úrslitið.

efter, at den pågældende aftale eller vedtagelse er truffet.

§ 3.

Til at føre kontrol med priser og avancer og andre forhold, som er nævnt i denne lov, nedsættes et prisråd med 3 medlemmer. Prisrådet vælges af lands-styret for 4 år. En af medlemmerne skal repræsentere forbrugerens interesser, en sælgernes interesser, medens det tredie medlem, som ikke må være direkte tilknyttet foranstående interesser, skal være formand. For hvert medlem vælges en suppleant.

Stk. 2. Priskontrollen udfører prisrådets daglige arbejde.

Stk. 3. Prisrådet fører ikke kontrol med forhold, der er underlagt anden offentlig kontrol under landet eller en kommune.

§ 4.

Rådet skal på eget initiativ følge med prisudviklingen og kan offentliggøre priser og prisforskelle på vigtige varegrupper, dog uden at nævne virksomhedens navn.

Stk. 2. Prisrådet kan undersøge priser og avancer hos de enkelte virksomheder.

Stk. 3. Før en undersøgelse i henhold til stk. 2 iværksættes, skal prisrådet forhandle med virksomheden om grundlaget for undersøgelsen. Før resultater efter stk. 1 offentliggøres, skal prisrådet give virsomheder eller foreninger, der har tilknytning til undersøgelsen, lejlighed til at udtale sig.

Stk. 4. Prísráðið kann frá øllum virkjum og stovnum, almennum sum privatum, krevja allar upplýsingar, sum hava týdning fyri virki ráðsins.

§ 5.

Prísráðið skal viðgera kærur um prís, vinning, samsýningar og gjøld viðvíkjandi vøru ella veitingum, ið kæraríin heldur vera órímiligan.

Stk. 2. Kemur Prísráðið til tað úrslit, at prísur, vinningur, samsýning ella gjald eru órímilig, skal ráðið eftir samráðingar við avvarðandi virki royna at fáa viðurskiftini í rættlag. Gevur hetta ikki nóg gott úrslit, skal ráðið taka til ásetingarnar í § 8. Prísráðið skal gera tann, ið kært hevur, kendan við úrslitið av kanningini.

Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 2 koma eisini til nýtslu, um Prísráðið í vanliga eftirlitsarbeiði sínum kemur fram á prís, vinning, samsýning, gjald ella handilstreyt, ið eru órímilig.

§ 6.

Í metanini av, um ein prísur ella vinningur er rímiligur, skal Prísráðið leggja til grund tær útreiðslur, sum seljarin hevur havt av vøruni, áðrenn hon er komin á goymslu, serliga innkeypsprís, almenn gjøld, farmagjald, tryggingar o. t. Heruframt skal ráðið hava í huga møguleikan fyri spilli, goymslutíð og annars øll viðurskifti, sum hava týdning fyri prísásetan.

§ 7.

Tað er ikki loyvt at handla ímillum handlandi í sama søluliði uttan so, at tí-

Stk. 4. Prisrådet kan af alle virksomheder og institutioner, offentlige som private, kræve alle oplysninger, som er af betydning for rådets virksomhed.

§ 5.

Prisrådet skal behandle klager over priser, avancer, honorarer og takster inden for vare eller ydelsesområde, som af klageren anses for at være urimelige.

Stk. 2. Kommer prisrådet til det resultat, at en pris, avance, honorar eller takst er urimelig, skal rådet efter forhandling med den pågældende virksomhed forsøge at få forholdene i orden. Giver dette ikke et tilstrækkeligt resultat, skal rådet gå frem efter bestemmelserne i § 8. Prisrådet skal underrette klageren om resultatet af undersøgelsen.

Stk. 3. Bestemmelserne i stk. 2 finder også anvendelse, såfremt prisrådet som led i sit almindelige kontrolarbejde finder frem til, at priser, avancer, honorarer, takster eller forretningsbetingelser er urimelige.

§ 6.

For vurderingn af, om en pris eller avance er rimelig, skal lægges til grund de udgifter, som sælgeren har haft af varen, før den er kommet på lager, specielt indkøbspris, offentlige afgifter, fragt, forsikringer o. l. Herudover skal rådet tage hensyn til mulighederne for spild, opbevaringstid og ellers alle forhold af betydning for prisafsættelse.

§ 7.

Det er ikke tilladt at sælge varer mellem handlende i samme omsætnings-

líkur handil ikki hevur dýrkan við sær.

Stk. 2. Tá vørur verða fluttar inn úr útlondunum, skal verða roynt at sleppa undan óneyðugum dýrkandi millum liðum, og skulu tílíkar vørur, har tað er gjørligt, verða innfluttar beinleiðis frá framleiðslulandinum. Prísráðið kann nokta at góðkenna óneyðugar millumhandlaraútreiðslur.

Stk. 3. Prísráðið kann seta bann ímóti innflutningi av vørum, sum føroyskur keypari ikki fær loyvi at innflyta beinleiðis úr framleiðslulandinum.

§ 8.

Fyri vinnuliga sølu av vøru her á landi og fyri vinnuliga veiting av tænastu og flutningi her á landi kann Prísráðið fyri upp í 6 mánaðir fyri ávísar vøru- og veitingarbólkar, heilar vinnugreinir ella stakfyritøkur áseta:

1. at prísur, gjøld, samsýningar ella vinningur, ið galda ávísan dag, ikki mega verða hækkað, ella
2. at prísur, gjøld, samsýningar ella vinningur, ið galda ávísan dag, ikki mega verða hækkað meiru enn upphæddir ella prosent, ið eru nærri uppgivin, ella,
3. at ikki má verða farið upp um prís, gjald, samsýning ella vinning, ið nærri er uppgivin.

Stk. 2. Prísráðið kann á tí øki, ið stk. 1 fevnir um, eftir samráðing við avvarðandi stakfyritøkur, vinnugreina- felagsskapir ella felløg fyriskipa, at til at rokna út prís, gjøld, samsýningar og vinning,

led, medmindre sådan handel ikke medfører fordyrelse.

Stk. 2. Ved indførsel af varer fra udlandet, skal importøren forsøge at undgå unødvendigt fordyrende mellemled, og sådanne varer skal, hvor det er muligt, indføres direkte fra oprindelseslandet. Prisrådet kan nægte at godkende unødvendige mellemhandlerudgifter.

Stk. 3. Prisrådet kan sætte forbud mod indførsel af varer, som færøsk køber ikke får lov til at importere direkte fra oprindelseslandet.

§ 8.

For erhvervsmæssigt salg af varer her i landet og for erhvervsmæssig levering af tjeneste- og transportydelser her i landet kan prisrådet for indtil 6 måneder for bestemte vare- og ydelsesområder, hele brancher eller enkeltvirksomheder bestemme:

1. at de en bestemt dato gældende priser, takster, honorarer eller avancer ikke må forhøjes eller
2. at de en bestemt dato gældende priser, takster, honorarer eller avancer ikke må forhøjes med mere end nærmere angivne beløb eller procenter, eller
3. at nærmere angivne priser, takster, honorarer eller avancer ikke må overskrides.

Stk. 2. Prisrådet kan inden for det af stk. 1 omfattede område efter forhandling med de pågældende enkeltvirksomheder, brancheorganisationer eller foreninger bestemme, at der ved beregning-

skulu ávísar útrokningarreglur verða nýttar.

Stk. 3. Prísráðið kann, eftir at avvarðandi stakfyritøkur, vinnugreinarfelagsskapir ella feløg hava havt høvi til at siga sína áskoðan, leingja ella broyta ásetingarnar sambært stk. 1 upp í 6 mánaðir í senn.

Stk. 4. Stk. 1-3 koma samsvarandi til nýtslu fyri prís og vinning, ið ásettir verða ella tilráddir til áframsølu í eftirfylgjandi keypsloliði.

Stk. 5. Henda grein viðvíkur ikki prís, gjøldum og samsýningum, ið landið ella ein kommuna áseta ella góðkenna.

§ 9.

Vørur, sum handlandi bjóða fram í sýnisglugga ella inni í krambúðini, skulu vera týðiliga prísmerktar. Eisini kann ráðið krevja, at prísir vera tilskilaðir, tá vørur ella tænastur verða bodnar fram í lýsingum.

Stk. 2. Prísráðið kann áseta nærri reglur um prísmerking, fakturering av vørum og útgreining av rokningum fyri gjørd arbeiðir.

§ 10.

Prísráðið kann krevja, at vørur, sum bert kunnu halda sær avmarkaða tíð, verða merktar annaðhvørt við framleiðsludegi ella seinast loyvda søludegi. Ráðið kann áseta nærri reglur fyri tílíkari merking.

§ 11.

Tá ið vøra ella tænasta verður boðin til sølu, er ikki loyvt at nýta rangar, villeið-

en af priser, takster, honorarer og avancer skal anvendes bestemte kalkulationsregler.

Stk. 3. Prisrådet kan, efter at de pågældende enkeltvirksomheder, brancheorganisationer eller foreninger har haft lejlighed til at udtale sig herom, forlænge eller ændre de i henhold til stk. 1 fastsatte bestemmelser for indtil 6 måneder ad gangen.

Stk. 4. Stk. 1-3 finder tilsvarende anvendelse for priser og avancer, der fastsættes eller tilkendegives for videresalg i efterfølgende omsætningsled.

Stk. 5. Denne paragraf vedrører ikke priser, takster og honorarer, der fastsættes eller godkendes af landet eller af en kommune.

§ 9.

Varer, som handlende fremviser i udstillingsvinduer eller inde i forretningen, skal være tydeligt prismærket. Rådet kan kræve, at priser også anføres, når varer eller tjenesteydelser tilbydes i annoncer.

Stk. 2. Prisrådet kan fastsætte nærmere bestemmelser om prismærkning, fakturering af varer og specifikation af regninger for udført arbejde.

§ 10.

Prisrådet kan forlange, at varer, som kun kan opbevares i begrænset tid, mærkes enten med fremstillingsdag eller sidst tilladte salgsdag. Rådet kan fastsætte nærmere bestemmelser for sådan mærkning.

§ 11.

Ved udbydelse af varer og tjenesteydelser er det ikke tilladt at benytte urig-

andi ella ófullfíggjaðar upplýsingar, sum kunnu ávirka eftirspurningin.

Stk. 2. Tá ið vøra verður biðin til sølu fyri niðursettan prís, skal tann prísur, ið seinast var á vøruni, týðiliga verða tilskilaður sum fyrri prísur.

§ 12.

Tað er ikki loyvt at bjóða garanti við sølu av vørum ella veitan av tænastu uttan so, at hesin garantitur gevur móttakaranum eina betri støðu, enn hann annars hevur eftir galdandi lóg.

§ 13.

Tað er ikki loyvt at geva vørum, sum verða fluttar inn úr útlondunum, heiti ella merki, sum er egnað at fáa keyparan at halda, at vøran er framleidd í Føroyum.

§ 14.

Prísráðið kann eftir kæru av sínum eintingum taka støðu til, um ein vøra ella eitt gjørt arbeiði lýkur tey góðskukrøv, sum rímiliga kunnu vera sett vørum ella arbeiði av slíkum slagi.

Stk. 2. Prísráðið hevur heimild til at fáa sær serkøna hjálp í teimum førum, tað metir neyðugt.

§ 15.

Hevur virki vunnið sær úrtøku av tiltøkum, sum eru ímóti avgerð, ið Prísráðið hevur tikið, kann Prísráðið gera av, at úrtøkan, ið vunnin varð ov mikið, verður drigin frá framtíðarvinningi.

tige, vildledende eller ufuldstændige oplysninger, som er egnet til at påvirke efterspørgselen.

Stk. 2. Ved udbydelse af varer til nedsat pris, skal varens seneste pris tydeligt angives som før pris.

§ 12.

Det er ikke tilladt at tilbyde garanti ved salg af varer eller ydelser af tjenester, medmindre denne garanti giver modtageren en bedre stilling, end han ellers har efter lovgivningen.

§ 13.

Det er ikke tilladt at give varer, som er importeret fra udlandet, betegnelse eller mærke, som er egnet til at få købere til at tro, at varen er fremstillet på Færøerne.

§ 14.

Prisrådet kan på grundlag af anke eller af egen drift afgøre, om en vare eller et udført arbejde opfylder de kvalitetskrav, som med rimelighed kan stilles til varer eller arbejder af den pågældende art.

Stk. 2. Prisrådet er bemyndiget til at antage sagkyndig hjælp på områder, hvor dette anses nødvendigt.

§ 15.

Har en virksomhed indvundet udbytte ved handlinger, der er i strid med en af prisrådet truffet afgørelse, kan prisrådet bestemme, at det for meget indvundne udbytte skal fradrages i fremtidige avancer.

§ 16.

Kærur um avgerðir Prísráðsins kunnu verða lagdar fyri yvirprísráðið í seinasta lagi 14 dagar eftir, at Prísráðið hevur boðað frá avgerð síni.

Stk. 2. Yvirprísráðið hevur 3 limir, sum verða valdir av løgtinginum fyri 4 ár. Fyri hvønn av limunum verður valdur varalimur.

Stk. 3. Innsend kæra um avgerðir Prísráðsins virka ikki freistandi, uttan so er at yvirprísráðið tekur avgerð um annað.

§ 17.

Við sekt ella hefti verður revsaður tann, ið:

1. brýtur §§ 2, 7, 9, 11, 12 og 13,
2. ger ikki eftir boðum ella brýtur bann, ið lagt er eftir § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1 og § 10, ella
3. gevur ikki upplýsingar, ið kravdar verða av honum eftir § 4, stk. 4 og § 9, stk. 1.

Stk. 2. Tann, sum í viðurskiftum, ið hoyra undir lógina, gevur Prísráðnum ella yvirprísráðnum rangar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur burtur viðurskifti, ið hava týdning fyri avgerð í málinum, verður revsaður við sekt ella hefti, uttan so er, at hann hevur uppiborið harðari revsing eftir borgarligari revsilóg.

Stk. 3. Í forskriftum, ið verða útgivnar saunbært lógini, kunnu verða ásetingar í forskriftunum.

Stk. 4. Er brot framt av partafelag, lutafelag ella slíkum, kann felagið sjálvt

§ 16.

Anke over prisrådets afgørelser kan forelægges overprisrådet senest 14 dage efter, at prisrådet har givet meddelelse om sin afgørelse.

Stk. 2. Overprisrådet har 3 medlemmer, der vælges af lagtinget for 4 år. For hvert medlem vælges en suppleant.

Stk. 3. Indgivelse af klage over prisrådets afgørelse har ikke opsættende virkning, medmindre overprisrådet bestemmer andet.

§ 17.

Med bøde eller hæfte straffes den, der:

1. overtræder §§ 2, 7, 9, 11, 12 og 13,
2. undlader at efterkomme et påbud eller overtræder et forbud, udstedt efter § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1 og § 10, eller
3. undlader at meddele oplysninger, som afkræves af ham efter § 4, stk. 4 og § 9, stk. 1.

Stk. 2. Den, som i forhold, der er omfattet af loven, meddeler prisrådet eller overprisrådet urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier forhold af betydning for den pågældende sags afgørelse, straffes med bøde eller hæfte, medmindre strengere straf er forskyldt efter borgerlig straffelov.

Stk. 3. I forskrifter, der udstedes i henhold til loven, kan der fastsættes straf af bøde eller hæfte for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

Stk. 4. Er en overtrædelse begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lig-

koma undir sektarábyrgd.

Stk. 5. Fyrningarfreist fyri revsiábyrgd er 5 ár.

Stk. 6. Við viðgerð av málum sambært hesi grein verða nýttar reglurnar í lóg um Rættargang kap. 69 í sama mun sum í málum, sum ríkisákæri reisir.

Stk. 7. Letur einhvør vera við at lata inn fráboðan í rættari tíð sambært § 2 ella at geva Prísránum umbidnar upplýsingar sambært § 4, stk. 4, kann landsstýrið eftir tilmæli ráðsins áleggja tí avvarðandi at gera skyldu sína hesum viðvíkjandi, ella kemur hann undir dagliga sekt ella sekt um vikuna, ið kann verða innheintað við panting.

§ 18.

Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1991. Samtíðis fer løgtingslóg nr. 43 frá 23. juni 1978 um príseftirlit úr gildi. Tó verður § 4 í løgtingslóg nr. 25 frá 24. apríl 1953 framvegis í gildi, til onnur lóggáva um gjaldoyraviðurskifti er framd.

nende, kan bødeansvar pålægges virksomheden som sådan.

Stk. 5. Forældelsesfristen for strafansvaret er 5 år.

Stk. 6. Ved behandlingen af sager i henhold til denne paragraf anvendes reglerne i lov om rettens pleje kap. 69 i samme omfang som i sager, der påtales af statsadvokaten.

Stk. 7. Undlader nogen rettidigt at indgive anmeldelse i henhold til § 2 eller at meddele prisrådet en i henhold til § 4, stk. 4 begæret oplysning, kan landsstyret efter rådets indstilling pålægge den pågældende under en daglig eller ugentlig bøde, der kan indrives ved udpantning, at opfylde sin pligt i så henseende.

§ 18.

Denne lov træder i kraft den 1. juli 1991. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 43 af 23. juni 1978 om priskontrol. Dog forbliver § 4 i lagtingslov nr. 25 af 24. april 1953 fortsat i kraft til anden lovgivning om valutaforhold er gennemført.

Broytingaruppskot

í

Løgtingsmáli nr. 25/1991: Løgtingslóg um príseftirlit (lm. 101/1990).

Í § 18 broytist "1. juli 1992" til: "1. apríl 1992".

I § 18 ændres "1. juli 1992" til: "1. april 1992".

26. Broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m. (Rentutryggingarlógini)

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om beskatning af renteforsikring m.v.

§ 1.

Í løgtinglóg nr. 51 frá 29. december 1971 um skatt av rentutryggingum v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1.

I lagtingslov nr. 51 af 29. december 1971 om beskatning af renteforsikring m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 4 gongur út, og sum nýggj § 4 verður sett:

"Rentur, sum verða góðskrivaðar kontoini fyri eini eftirlønarskipan við innskoti í peningastovn v.m., skulu ikki roknast upp í ta skattskyldugu inntøkuna. Rentuskattur verður latin av hesum rentum sambært lóg um renturskatt."

1) § 4 udgår, og som ny § 4 indsættes:

"Renter, der tilskrives en konto vedrørende en pensionsordning med indskud i pengeinstitutter m.v., skal ikke medregnes i den skattepligtige indkomst. Der tilsvares renteskat af disse renter i henhold til lov om rentebeskatning."

2) § 7 gongur út og sum nýggj § 7 verður sett:

"Av tí avgjaldsskyldugu peningshæddini, sum er útroknað eftir reglunum í § 6, og sum er minkað niður í næstu peningshædd, sum kann býtast við 100, verður latið avgjald til landskassan upp á 35% av samantaldu inngjaldingunum, meðan rentan verður skattað sbrt. § 4. Viðkomandi tryggingarfelag- ella

2) § 7 udgår, og som ny § 7 indsættes:

"Af det efter reglerne i § 6 opgjorte afgiftspligtige beløb, afrundet nedadtil det nærmeste med 100 delbare kronebeløb svares en afgift til landskassen på 35% af de sammenlagte indbetalinger, medens renten beskattes i henhold til § 4. Det påhviler vedkommende forsikringsselskab eller pensionskasse

eftirlønarkassi v.m. hevur skyldu til, tá ein útgjalding, sum er umrødd í § 6, skal fara fram, at útrokna og afturhalda avgjaldið, og innan 4 vikur, aftan á at felagið hevur fingið kunnleika um avgjaldsskylduna at inngjalda avgjaldið til landskassan. Tær í § 6 umrøddu útgjaldingarnar v.m. verða ikki taldar við, tá tann skattskylduga inntøkan verður uppgjørd. Avgjaldið kann ikki dragast frá, tá tann skattskylduga inntøkan verður uppgjørd. Útrokningin av avgjaldinum kann innan 4 vikur, eftir at boðað er frá gjaldsskylduni, av tí avgjaldsskylduga verða kravd eftirkannað av Líkningarráðnum. Kæra um avgerð Líkningarráðsins kann leggjast fyri Landsskattanevndina innan 4 vikur eftir at Líkningarráðið hevur tikið avgerð sína. Tær fyri innkrevjing av skatti galdandi reglur verða nýttar fyri umrøddu avgjøld, um tær annars samsvara við ástøðingunum í hesi lóg."

3) Sum nýggj § 7 B verður sett:

"Peningsstovnar, tryggingarfeløg, eftirlønarkassar v.m., sum taka ímóti innskotum til eftirlønartryggingar, hava skyldu til at sundurgreina inngjøld og rentutilskrivingar soleiðis, at tað til eina og hvørja tíð stendur greitt fyri t.d. skattavaldi og eigara, hvussu býtið er."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

m.v. ved udbetalingen af beløb af den i § 6 omhandlede art at beregne og indeholde udgiften, som inden 4 uger efter, at selskabet m.v. har fået kendskab til dispositionen, indbetales til landskassen. De i § 6 omhandlede udbetalinger m.v. medregnes ikke ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst. Afgiften kan ikke fradrages ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst. Beregningen af afgiften kan af den afgiftspligtige inden 4 uger efter, at underretning om afgiftens indeholdelse er givet, begæres efterprøvet af Ligningsrådet. Over Ligningsrådets afgørelse kan klage indgives til Landsskatteudvalget inden 4 uger efter, at Ligningsrådet har truffet sin afgørelse. Iøvrigt kommer de for inddrivelse af skat gældende regler til anvendelse på omhandlede afgift for så vidt de er forenelige med bestemmelsen i nærværende lov."

3) Som ny § 7 B indsættes:

"Pengeinstitutter, forsikringsselskaber, pensionskasser m.v., som tager imod indskud til pensionsforsikring, er pligtige til at specificere indbetaling og rentetilskrivning således, at det til enhver tid er tydeligt tilkendegivet for f.eks. skattemyndigheden og ejeren, hvordan fordelingen er."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Rentan av uppspardum peningi, sum stendur á bók, verður skattað sambært lóg um rentuskatt við 1/2%.

Rentan av bundnari eftirlønaruppsparing (kapitalpensión) verður skattað við 35%.

Tann bundna eftirlønarsparingin kann trekkjast frá tí skattskyldugu inntøkuni beinanvegin. Skatturin fellur ikki til gjaldingar, fyrr enn uppsparingin verður útgoldin. Tá verða bæði innskot og renta skattað við 35%.

Eftirlønaruppsparingin kann í fyrsta lagi (undantøk eru tó við deyða, tá flutt verður av landinum ella við giftir) verða útgoldin, tá uppspararin verður 60 ár og í seinasta lagi, tá uppspararin verður 70 ár.

Tað er eingin loyna, at fólk himprast við at fara undir eftirlønaruppsparingina, av tí at tey óttast fyri, at tað politiska valdið í trongstøðu skal finna upp á at hækka skattaprosentið.

Hesin ótti hevði verið beindur burtur, um rentan av eftirlønaruppsparingini hevði verið skattað á sama hátt sum innistandandi peningur á bók.

Hetta hevði ivaleyst havt við sær, at fólk í størri mun høvdu lagt seg eftir langtíðaruppsparing heldur enn at sett inn á bók. Bankarnir høvdu fingið tryggari innskot og uppspararin eina hægri rentu av somu orsøk.

Tað er tíverri ein sannroynd, at meginparturin av rentutilskrivingini hjá bankunum verður tikin út aftur so hvørt. Hetta hevur samband við ringu tíðirnar, men er eisini eitt úrslit av lágu innlánsrentuni. Ein betri eftirlønaruppsparing hevði verið við til at bøtt um hesa gongd.

Við tí dapra búskaparliga útliti, sum er fyri framman, er einki at ivast í, at tað framyvir verða lutvíst færri ung, sum koma at gjalda til eitt vaksandi tal av eldri samfelagsborgarum. Samstundis verða almannaútreiðslurnar til yngra ættarliðið eisini øktar vegna vantandi arbeiðsmøguleikarnar í landinum og teimum sosialu trupulleikunum, sum koma í kjalavørrinum.

Tað er tí umráðandi, at fólk longu á ungum árum fáa góðar møguleikar sjálv at tryggja sær ein høgan livifót á gamaldsaldri. Fólkapensiónin munar ikki nógv, men saman við einari góðari kapitalpensión við skattafyrimuni, sær myndin heilt øðrvísi út.

Inngjaldið til eftirlønarskipanina er vanliga ein føst flyting hvønn mánað. Upphæddin kann lagast eftir inntøkuni og nýtist ikki at vera tann sama á hvørjum ári.

Tann uppspardi peningurin kann ikki veðsetast, og útlegg kann ikki verða gjørt í eftirlønini. Hetta ger, at uppspararin er tryggjaður, hóast viðkomandi skuldi komið illa fyri fíggjarliga. Um uppspararin doyr, fellur eftirlønin til hjúnafelaga og børnini.

Dømi 1 vísir, at tann, sum 30 ára gamal fer undir at rinda 500 kr. um mánaðin,

fær útgoldið 611.230,89, tá hann verður 60 ár. Tá hevur viðkomandi goldið 329.124,32 í skatti, t.v.s. 35%.

Dømi 2 vísir, at sami persónur eftir nýggja uppskotinum fær kr. 787.294,12 útgoldið. Tá hevur hann goldið 35% í skatti av innskotinum og 1/2% í rentuskatti.

Dømi 3 vísir, at tann, sum rindar 200 kr. um mánaðin til eftirlønaruppsparingina, fær 314.917,65 kr. útgoldnar eftir 30 árum eftir nýggja uppskotinum.

Tann, sum hevur møguleikar at spara 29.200 kr. um árið (við skattafyrimuni, t.v.s. at árligi nettokostnaðurin hevði bert verið helvtina), sum er hægst loyvda uppsparingin í løtuni, hevði aftan á 30 ár fingið útgoldið ikki minni enn 3.824.989 kr. eftir hesum lógaruppskoti.

Fyritreytin í hesum seinasta dømminum er bústaður í Tórshavnar kommunu og ein marginalskattur upp á 53%.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 26/1991: Broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v. m. (Rentutryggingarlógin).

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 19. november 1991 og eftir 1. viðgerð 26. november 1991 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri peningastovn og Føroya Lívstrygging.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Videro) ásannar, at uppsparing í einum samfelag er neyðug. Lógin til sonevnda eftirlønartuppsparing (kapitalpensión), sum nú er galdandi, gevur fyrimunir frum um aðra uppsparing og sambært peningastovnunum er áhugin fyri tílíkari uppsparing vaksandi.

Upplýst er, at tílík uppsparing er tryggjað soleiðis, at hon ikki kann veðsetast. Tað merkir, at persónur, sum hevur spart upp í ávíst áramál og sostatt hevur týðandi upphædd standandi, ikki kann fara undir virki, har hann veðsetir innistandandi fyri kassakreditt soleiðis, at rentan verður 10-11%, men noyðist at taka kassakreditt við møguligum persónligum veðhaldi við eini rentu upp á umf. 17%.

Við fyriliggjandi uppskoti verður givin ein munandi skattalætti í mun til núverandi skipan. Um vit taka sum dømi ein persón, ið sparir kr. 500,- um mánaðin í 30 ár, so fær viðkomandi við núverandi skipan útgoldið umf. 600.000 kr., har goldið er 323.000,- í skatti. Eftir fyriliggjandi uppskoti fær viðkomandi útgoldið 774.000,- kr. og skal bert gjalda 121.000 í skatti. Hetta svarar til ein skattalætta

upp á 63%, umframt gevur fyriliggjandi uppskot hesum persóni 173.000,- kr. meira, meðan landskassin fær 202.000,- kr. minni. Munin umleið 30.000,- kr. fær peningastovnurin.

Skipanin við kapitaluppsparing verður ikki bert boðin frá peningastovnunum, men Føroya Lívstrygging gevur eisini tílíka trygging. Við núverandi lóggávu eru hesir líkastillaðir, men við fyriliggjandi uppskoti verður munur gjørdur á. Í dag er skatturin 35% av útgjaldinum, meðan í fyriliggjandi uppskoti skal gjaldast sambært lóg um rentuskatt, t.v.s. 1/2%. Føroya Lívstrygging er ikki umfatað av lógini um rentuskatt, so har verður rentan skattafrí.

Fyriliggjandi uppskot umfatar bert kapitaluppsparing við eingangsútgjaldi. T.v.s. at størri skattafyrimunur skal gevast av skipan við eingangsútgjaldi, meðan persónur, sum vil hava uppsparingina útgoldnað yvir nøkur ár, tá hann verður 60 ár, hann fær ikki skattafyrimunin í fyriliggjandi uppskoti.

Havandi í huga, at núverandi skipan gevur stóran skattafyrimun fram um vanliga uppsparing, meðan landskassans inntøkur minka í stórum, metir meirilutin, at tíðin ikki er búgvin til at geva ávísum ein skattalætta upp á 63%. Meirilutin mælir tí frá at samtykkja uppskotið og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Lasse Klein) hevur hesar viðmerkingar:

Ásannandi, at meiriluti ikki verður fyri hesum máli, soleiðis sum tað er orðað, setir minnilutin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot, sum broytir skatting av kapitalpensjónini frá 35% til 30%.

27. Viðvíkjandi veðseting av sethúsum

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at tað ikki skal verða møguligt í framtíðini at veðseta íbúðarhús til onnur endmál enn tað, tey eru ætlað til.

Viðmerkingar

Í dag kenna vit fleiri óheppin dømir um, at fólk í góðari trúgv hava veðsett íbúðarhús síni til onnur endamál enn til íbúðarhúsini, tey búgva í, og hetta hevur í størri og størri mun ført við sær, at hesi veðhald eru gjørd effektiv, og at endabresturin hevur verið, at tvingsilssøla er krevd, og at fólk eru sett út á gøtuna.

Tað, sum vanliga hevur verið mett sum ein mannarættur, at eiga egnan bústað, er í álvarsomum vanda, og tí er neyðugt, um sleppast skal burtur úr hesum álvarsama trupulleika, at lóggivið verður soleiðis, at tað skal ikki verða møguligt í framtíðini at veðseta íbúðarhús á ein slíkan hátt, at vandi er fyri, at tey rúka orsakað av øðrum veðsetingum..

Vit hava mong dømi um, at fólk hava veitt trygd fyri ávísum egnum endamálum, og fyri onnur, sum standa teimum nær, við tí úrsliti, at tey eru komin sera illa fyri fíggjarliga, tá tey sjálvi og tey, sum tey hava veðhildið fyri, ikki er før fyri at gjalda.

Í ringasta føri hevur hetta ført við sær, at fólk av somu orsøk eru farin frá "húsi og heimi", til stóran ampa fyri familjuna, og tey hava av somu orsøk ilt við at fóta sær aftur í samfelagnum. Tí verður sett fram hetta uppskot til samtyktar.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 27/1991: Viðvíkjandi veðseting av sethúsum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. oktober 1991 og eftir 1. viðgerð 19. november 1991 beint í rættarnevndina.

Við tingmálinum mælir landsstýrið løgtinginum til við uppskoti til samtyktar at góðkenna, at ST-sáttmáli frá 20. november 1989 um rættindi hjá børnum verður lýstur at galda í Føroyum. Sáttmálin hevur fingið gildi fyri Danmark, men

er fyrivarni sum vanligt tikið fyri Føroyar. Landsstýrið upplýsir í málinum, at sáttmálin ikki ger tað neyðugt at gera nakrar broytingar í føroyskari lóggávu.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir tí samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

28. Viðvíkjandi likvidatión og sjálvbodnari likvidatión

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til at seta tiltøk í verk, ið forða fyri misbrúki, tá talan er um likvidatión og sjálvbodna likvidatión, og at koma við lógaruppskoti, sum klárt og týðuliga forðar fyri misbrúki á hesum øki.

Viðmerking

Tað er vorðið alt meira og meira vanligt, at fyritøkur geva skarvin yvir, at fyritøkurnar verða kravdar í likvidatión, og í triðja lagi verður gjørt av at fara í sjálvbodna likvidatión.

Vit kenna fleiri dømi um, at í førum, har fyritøkur lata seg "fara" í likvidatión, verður hetta gjørt við tí endamáli, at avtala er gjørd frammanundan um, at somu ánarar skulu kunna keypa rakstrargagnið aftur við tí úrsliti, at landskassin og teir "vanligu kreditoratnir" missa hópin av peningi.

Í øðrum londum hevur verið vanligt at "spekulera" í at lata fyritøkur fara av knóranum, fyri síðani at fáa skattatekniskar fyrimunir av trotabúnum.

Í Noreg og Svøríki hevur hetta slagið av handli verið so vanligt, at stjórnirnar har hava hildið tað verið neyðugt at komið við lóggávu á økinum, fyri at forða fyri misbrúki av skaftaborgaranna peningi.

Í onkrum av londunum er lógarreglan tann, at somu fólk ikki kunnu keypa rakstrargagnið aftur, og at tað skal ganga eitt ávíst áramál, áður enn viðkomandi fólk kunnu koma aftur í somu vinnu.

Í Føroyum hava vit fingið týðuliga fatan av, at somu viðurskifti gera seg galdandi, hur ánarar, peningastovnar og kredittfeløg gera sínamillum avtalur um handil við fyritøkum, sum hava trupult við at bera seg, og í fleiri førum hevur avtalan verið tann, at fyritøkan skal koyrast av knóranum, fyri síðani at somu

fólk keypa aftur rakstrargagnið fyri ein nógv bíligari pening til stóran ampa fyri landskassan og skattaborgararnar.

Umhugsað eigur at verða at seta lógarreglur í verk í Føroyum, sum forða fyri misbrúki, og at tey, sum gera hetta, ikki kunnu reka vinnu á sama øki fyrr enn um 5 til 10 ár ella keypa sama rakstrargagnið aftur.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 28/1991: Viðvíkjandi likvidatión og sjálvbodnari likvidatión.

Málið er lagt fram av Sjálvstýrisflokkinum tann 19. november 1991 og eftir 1. viðgerð 28. november 1991 beint í rættarnevndina.

Uppskot er til samtyktar um, at landsstýrið tekur neyðug stig til at seta í verk tiltøk, sum forða fyri misbrúki, tá talan er um likvidatión og sjálvbodna likvidatión, og at koma við lógaruppskoti, sum klárt og týðuliga forðar fyri misbrúki á hesum øki.

Nevndin hevur viðgjørt hetta álvarsmál og er vorðin varug við, at ikki bert er tann almenna uppfatanin, at ánarar í nógvum førum "spekulera" meira enn gott er í afturkeypi av "egnum" ognum, sum fara í likvidatión, men verulig "spekulatión" og eftirfylgjandi keyp fara fram, kanska serliga í førum, har landskassin er kreditor.

Í nógvum førum er nýstovnað 10.000 kr. partafelag keypari. Nakað av hesum misbrúki kundi verið komið til lívs við at stilla størri krøv til eginognina hjá honum, sum keypir. Rættarnevndin er vitandi um, at landsstýrið hevur sett niður nevnd til at kanna neyðugar broytingar í partafelagslógini. Úrslitið fyriliggur ikki enn, men ein partur av tí verður óivað munandi størri krøv til eginpening. Hetta hjálpir óivað væl upp á tann trupulleika, sum uppskotstillarin vísir á í hesum uppskoti.

Annars er tað reiðiliga upplagt, at kreditorar í einum trotabúgvi (tað kunnu vera eigarar, bankar, landskassin ella aðrir) "lúra hvønn annan av" fyri at bjarga egnum álugamálum sum best. Kreditorarnir tosa sjálvsagt saman fyri at finna fíggjarliga skilagóðar loysnir fyri allar partar.

Støðan hjá landskassanum kann vera eitt sindur serlig, bæði tá veðrættarstøðan er góð (liggur innanfyri virðið av ognunum), og tá veðrættarstøðan er minni góð, (liggur partvís uttanfyri og partvís innanfyri virðið av ognini). Aloftast er støðutøkan hjá landsstýrinum kend frammanundan, tí ein politisk prinsippavgerð er tikin um, hvussu fram skal farast, tá eitt trotabúgv skal viðgerast. Tá veðrættarstøðan er vánalig, er tað sjálvsagt freistandi at "spekulera" í hesum. Men her er vanliga eingin munur á, um tað er landsstýrið ella annar kreditor. Fyri kreditor í

góðari veðrættarstøðu er tað sjálvsagt óhcppið, at hinir kreditorarnir frammanundan vita, at *a)* landsstýrið er ikki keypari og *b)* at tað er politiskt avgerandi, at ein avgerð fellur skjótt. Tá er ikki torført hjá øðrum kreditori saman við keypara at vita, hvat gerast skal. Tí kann rættarnevndin bert ráða til, at landsstýrið røkir sína uppgávu sum kreditor á besta hátt og tekur støðu til tey ymisku málini út frá umstøðunum. Er politisk støða tikin frammanundan, so kann ein sum kreditor koma út fyri ikki at hava nógv kort á hondini, og so má man liva við tí.

Tað finnast sum øllum kunnugt ómgrógvin rættarsystem, sum tryggja allar partar á rímiliga góðan hátt.

Tað vil ongantíð vera lætt at taka støðu til, um ávísur (-ir) persónur (-ar) skal (skulu) fáa loyvi til at keypa eina ogn aftur. Nær skal ein persónur, sum t.d. hevur verið við í einum partafelag, sum má stcðga sínum virksemi, fáa loyvi til at vera við í øðrum partafelag, sum keypir ognirnar aftur. Ella nær kanst tú forða einum partánara í? Avgerðir av hesum slagi vilja altíð vera sera subjektivar.

Við tað, at tað ikki slepst undan, at støðan viðvíkjandi viðgerð av trotabúgvum mann og mann ímillum ofta kann tykjast órímilig og við tað, at hetta ikki bert er ein trupulleiki her hjá okkum, setir ein samd rættarnevnd fram í staðin fyri uppskot Sjálvstýrisfloksins soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna, hvat gjørt verður í øðrum londum fyri at sleppa undan misbrúki í samband við likvidatiónir, serliga tá almennur penjngur stendur fyri tapi, og um møguliga at taka úrslitið av kanningunum við í nevndararbeiðinum, sum í løtuni verður gjørt viðvíkjandi partafelagslóg, bankalóg, roknskaparlóg v.m.

29. Løgtingslóg um toll

Uppskot

til

Løgtingslóg um toll.

Kap 1: Tolløkið

§ 1.

Tolløkið fevnir um føroyskt landøki, firðir og havleiðina við Føroyar út til 3 sjómíl (5556 m) frá beinum grundlinjum og loftrúmið yvir nevnda øki.

Kap 2: Tollur, vøruskráin og upprunareglur.

§ 2.

Tollur skal rindast fyri allar vørur, ið verða innfluttar á tolløkið, og sum ikki eru fríliknar fyri toll smb. §§ 3, 4 og kap 3.

§ 3.

Avgerandi fyri tollsatsir og tarifering er vøruskráin fyri inn- og útflutning sett upp grundað á nomenklatur tollsamvinnuráðsins "Harmonized Commodity Description and Coding System" (Tillagaða Skipanin) og tær í vøruskránni vanligu tariferingsreglur viðvíkjandi tillagaðu skipanini.

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur um nýtslu av vøruskránni í sambandi við fyrisitingina av hesari lóg.

§ 4.

Fyri vørur, ið ikki hava uppruna í Europeiska felagsskapinum, verður um-

Lagtingslov om told.

Kap. 1: Toldområdet

§ 1.

Toldområdet omfatter de færøske landområder, fjorde og farvande omkring Færøerne i en afstand af 3 sømil (5556 m) fra rette basislinjer samt loftrummet over de nævnte områder.

Kap. 2: Told, varefortegnelse og oprindelsesregler

§ 2.

Told skal svares af alle varer, der indføres i toldområdet, og som ikke er fritaget for told i henhold til §§ 3, 4 og kap 3.

§ 3.

Afgørende for toldsatser og tarifering er varefortegnelsen for ind- og udførsel opstillet på grundlag af toldsamarbejdsrådets nomenklatur "Harmonized Commodity Description and Coding System" (HS) og de i varefortegnelsen almindelige tariferingsbestemmelser vedrørende det harmoniserede system.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for anvendelse af varefortegnelsen i forbindelse med administration af denne lov.

§ 4.

Af varer, som ikke har oprindelse i Det Europæiske Fællesskab, skal foruden

framt vanligan toll at rinda GATT-toll sum ásett í vøruskránni.

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað til í kunngerð, grundað á sáttmálan við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin øðrumegin og ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hinumegin, at ásetta nærri reglur um uppruna-reglur.

3. stk. Fyri vørur, ið eru umfataðar av handilssáttmála millum Føroyar og fremmand lond ella felagsskapir, fellur GATT-tollurin burtur ella verður lækkaður smb. landsstýrisins fyriskipan, tá ið viðkomandi sáttmáli er góðkendur av Føroya Løgtingi.

almindelig told svares GATT-told som fastsat i varefortegnelsen.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse baseret på aftale mellem Det Europæiske økonomiske fællesskab på den ene side og Danmarks regering og Færøernes Landsstyre på den anden side at fastsætte nærmere bestemmelser om oprindelsesregler.

Stk. 3. For varer, der er omfattet af handelsaftaler mellem Færøerne og fremmede lande eller fællesskaber, bortfalder eller nedsættes GATT-tolden i henhold til landsstyrets bestemmelser, når vedkommende aftale er vedtaget af Færøernes Lagting.

§ 5.

Vøruskráin við ásettum tollsatsum er til skjals og kann keypast á Føroya Tollstovu.

§ 5.

Varefortegnelsen med toldsatser foreligger til gennemsyn og kan købes på Færøernes Toldkontor.

Kap. 3: Tollfrítøka

§ 6.

Undantikið tolli er:

a. Ferðagóðs, t.v.s. klæðir og aðrir ferðalutir, sum ferðafólk hava í viðføri, tá ið tollvaldið heldur, at nøgd og slag er sovorðið, at ferðafólkið kann ætlast at hava tað til egna nýtslu á ferðini. Tann eftirlitsansan, ið tørvur er á, verður sett av landsstýrinum, sum hevur heimild at geva loyvi til frían innflutning av smálutum, sum ferðafólk hevur við sær, tá ið tollurin lítið og einki hevur at týða.

Kap. 3: Toldfrihed

§ 6.

Fritaget for told er:

a. Rejsegods, dvs. beklædningsgenstande og andre rejseformødenheder, som rejsende medfører, forsåvidt de med hensyn til mængde og beskaffenhed af toldvæsenet skønnes at blive indført til den rejsendes eget brug under rejsen. De fornødne kontrolforanstaltninger fastsættes af landsstyret, der endvidere har bemyndigelse til at tillade fri indførsel af småting, som medbringes af rejsende og for hvilke

b. Flytigóðs, tá ið ánarin hevur verið búsettur í hinum partinum av ríkinum ella í útlondum í minsta lagi 1 ár, tá ið lutirnir bera merki av at vera brúktir, og tá ið teir verða innfluttir fyri rokning ánarans og til nýtslu fyri tey, ið brúkt teir hava frammanundan. Um hetta verður latin váttan uppá æru og trúgv. Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur um, úr hvørjum londum og eftir hvørjum treytum akfør, bátar og flogfør kunnu verða innflutt sum flytigóðs.

b. Flyttegods, forsåvidt ejeren har været bosat i den øvrige del af riget eller i udlandet i mindst 1 år, når de pågældende genstande bærer spor af at være brugt, og når de indføres for dennes regning og til brug for dem, der allerede har afbenyttet disse. Herom afgives erklæring på tro og love. Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for, fra hvilke lande og efter hvilke betingelser motorkøretøjer, både og luftfartøjer kan indføres som flyttegods.

c. Klædnapløgg og ferðagóðs, ið onkur heimahoyrandi her hevur átt, sum deyður er uttan fyri tolløkið Tó skal tollvaldið kunnað ætla, at lutirnir hava verið brúktir.

c. Beklædningsgenstande og rejsegods, der har tilhørt en her hjemmehørende, som er død uden for toldområdet, forsåvidt genstandene af toldvæsenet skønnes at være brugt.

d. Instrument o.t., ið ferðandi listafólk nýta í teirra yrki, tá ið tollvaldið kann ætla, at lutirnir hava verið brúktir.

d. Instrumenter m.v., som rejsende kunstnere benytter til udøvelse af deres kunst, når sådanne genstande af toldvæsenet skønnes at være brugt.

e. Fyrimyndir og sýnislutir av annars tollskyldugum vørum, tá ið tað kann ætlast, at tey ikki hóska til annað brúk.

e. Modeller og prøver af i øvrigt toldpligtige varer, når de skønnes ikke at være tjenlige til andet brug.

f. Listaverk, fomgripir og tílíkt til almenn søvn ella annað alment endamál.

f. Kunstværker og museumsgenstande og deslige til offentlige samlinger eller andet offentligt brug.

g. Ortopediskir lutir, protesur (tó undantikið tannprotesur), hoyritól og glaseygu v.m.

g. Ortopædiske genstande, proteser (dog undtaget tandproteser), høreapparater og glasøjne m.v.

h. Gávupakkar, hvørs tollur lítið og einki hevur at týða.

h. Gavepakker, for hvilke tolden er ubetydelig.

§ 7.

Tollvaldinum verður heimilað at veita tollfrían innflutning við eftirliti:

a. fyri tað, ið skipum og flogførum tørvar, meðan tey eru stødd á tolløkinum,

b. fyri brúktar lutir, ið innfluttir verða sum gávur ella arvur til ómúgvandi, somuleiðis fyri aðrar lutir, ið innfluttir verða sum gávur til góðgerafeløg, ella til stovnar og tílíkt.Eisini fyri brúðarútbúning, tá ið tað er persónur, sum í minsta lagi í 2 ár hevur verið búsettur í útlandi, og sum vegna giftu við persóni í tolløkinum nú flytur higar. Undantiknar fyri tílíkt tollfrælsi eru mat- og drykkjuvørur ótilgjørt tógv og manufakturvørur eins og aðrar vørur, ið ætlaðar eru til víðari viðgerð og eisini øll sløg av rávevni,

c. fyri lutir, ið koma higar til umvælingar, vask, stutt brúk o.t. og verða fluttir útaftur. Fyri maskinur, tól og amboð, ið verða nýtt vinnuliga kann tollfrírur innflutningur bert veitast sum tollendurgjald, ið er 8,33% fyri hvønn mánað vørurnar hava verið á tolløkinum styttri enn 12 mánaðir.

d. fyri vørur, ið oyðilagdar eru, áðrenn tollurin er rindaður,

e. fyri vørur, sum aftaná at verða útfluttar úr tolløkinum verða førdar higar aftur,

f. fyri innlendskar ella útlendskar

§ 7.

Toldvæsenet bemyndiges til at bevilge toldfri indførsel under kontrol:

a. af skibs- og luftfartøjers fornødenheder under disses ophold i toldområdet.

b. af brugte genstande, der indføres som gaver eller arv til uformuende, og tillige af andre genstande, der indføres som gaver til brug for velgørende stiftelser eller for institutioner og lignende. Endvidere af brudeudstyrsgenstande, forsåvidt de er bestemt for personer, der har været bosat i udlandet mindst 2 år, og som på grund af giftermål med en i toldområdet bosat person flytter her til. Undtaget fra sådan toldfrihed er spise- og drikkevarer, ufor arbejdet garn og manufakturvarer såvel som andre til videre forarbejdning bestemte frembringelser, samt alle slags råstoffer,

c. af varer, der kommer hertil til reparation, vask, midlertidig anvendelse o.lign. og genudføres. For maskiner, apparater og redskaber, som bliver brugt erhvervsmæssigt kan toldfri indførsel kun tillades som toldrefusion, der er 8,33% for hver måned, varerne har været i toldområdet mindre end 12 måneder.

d. af varer, som bliver ødelagt, inden tolden er betalt,

e. af varer, som efter at være udført fra toldområdet, føres tilbage hertil,

f. af indenlandske eller fremmede

goldnar vørur, ið við at flytast úr einum plássi til annað á tollløkinum eru farnar yvir fremmant stað, ella sum aftan á at verða útfluttar hiðani verða førdar heimaftur, av tí at tær ikki hava funnið sølu ella av aðrari orsøk.

g. fyri motorakfør, campingvognar, flogfør og stuttleikabátar, ið persónar, sum ikki eru fastbúgvandi her, eiga, og sum teir sjálvir flyta inn higar fyri stutta tíð til egna nýtslu, meðan teir eru her, og tá ið hesi før ikki verða brúkt til vinnuligan flutning. Sum fastbúgvandi er at skilja persónur, sum er skrásettur sum fastbúgvandi hjá landsfólkayvirlitinum.

h. fyri vørur, sum fremmanda landa diplomatiskir sendimenn á almennari vitjan sjálvir flyta inn sum borðfæ o.t. og í undantaksføri hjá útlendskum skipi, sum søkir tolleftirlitshavn á tollløkinum.

Hetta, at Føroyar nú skulu gera mun á hvønn uppruna vøran hevur, merkir, at upprunareglur skulu brúkast í framtíðar tolllóggávu. Higartil hevur tað verið soleiðis, at tollur hevur verið kravdur av vørum, uttan mun til hvar vøran hevur havt uppruna. Aftaná 1. januar 1992 skal skiljast ímillum, hvar vøran hevur uppruna. Er t.d. talan um japanskt akfar, sum verður innflutt gjøgnum Danmark, skal umframt vanligan toll krevjast GATT-tollur.

Vøruskráin við tollsatsum og tariferingsreglum er ein partur av tolllógini og verður tí løgd fram fyri løgtingið og má viðgerast sum eitt hvørt annað lógaruppskot.

Í 1992 hava Føroyar tó loyvi til at varðveita teir tollsatsir, ið eru galdandi í dag, men í 1993 fellur allur tollur millum Føroyar og EF burtur, og í staðin kemur eitt meirvirðisgjald, sum eisini verður kravt við innflutning av vørum og tænastum. Hetta gjaldið kemur soleiðis í staðin fyri tey 33%, ið er serligt og eyka innflutningsgjald í dag.

Hevur vøran uppruna í EF, skal bert tollur smb. núgaldandi tolllóggávu uppkrevjast.

1992 verður sostatt í mangar mátar eitt yvirgangsár. Fyri ein part kunnu Føroyar varðveita teir núgaldandi tollsatsirnar og núgaldandi reglur um, at endamálið er avgerandi fyri, hvør tollur skal rindast.

Hinvegin skal tolllógin broytast, soleiðis at hon fylgir altjóða vøruskránni (HS), har tollsatsir eru tilskilaðir fyri hvørja einstaka vøru.

Neyðugt hevur tí verið at finna tær vørur í vøruskránni, sum hava havt lægri toll sambært higartil galdandi reglum, t.d. tilfar til fiskivinnuna, og at seta tollsatsirnar á hesum vørum soleiðis, at hesir fyri 1992 koma at samsvara á besta hátt við tað, ið hevur verið galdandi higartil.

Hetta lógaruppskotið, sum verður galdandi í 1992, er í stuttum eitt uppskot, ið er grundað á núgaldandi tolllóggávu, tvs. løgtingslóg um innflutningsgjald, serligt innflutningsgjald og eyka innflutningsgjald. Hetta merkir, at flestu av teimum reglum, ið eru í núgaldandi tolllóggávu, eru endurtiknar í hesum lógaruppskoti.

Tó eru framleiðslugjøldini tikin burtur úr, og reglurnar um tollvirðið, tað er virðið á vøruni, er gjørt til eitt cif-virði.

Higartil hevur virðið í løgtingslóg um innflutningsgjald, verið fob, meðan virðið í lógunum um serligt og eyka innflutningsgjald hevur verið cif.

Harnæst eru reglurnar um upprunareglur nýggjar, á sama hátt sum reglur nú eru settar um skráseting av vinnuligum innflytarum.

Eisini er nógv av umsitingini av tolllógini, ið fyrr var hjá landsstýrinum løgd til tollstovuna, og í hesum sambandi er uppskot landsstýrisins, at sett verður ein kærunevnd, ið skal viðgera flestu avgerðir, ið Føroya Tollstova hevur tikið.

Av avgerandi broytingum kunnu nevnast, at kundar skulu fylla út eina sokallaða tollingaráheitan - tað er eitt skjal, har upplýsingar um vøruna eru uppgivnar, t.d. hvar vøran hevur uppruna, hvat virðið er osfr. - og at hagstovan skal arbeiða við hagtølum, ið Føroya Tollstova útvegar teimum.

Higartil hevur tað verið soleiðis, at hagstovan hevur fingið hagtøl frá Danmarks Statistik fyri útflutning frá Danmark til Føroya, meðan Føroya Tollstova hevur útvegað hagstovuni innflutningstøl frá øðrum londum enn Danmark. Skipanin kemur óivað at seta størri krøv til kundar, ið skulu tollgreiða vørur, men við nútímans edv-útgerð á øllum tolldeildum í landinum skuldi tað verið lættari og skjótari at tollgreitt kundarnar.

Í hesum sambandi eru eisini gjørdar serligar reglur um tollviðgerð av vørum, ið hava eitt tollvirði undir kr. 3000. Hetta er gjørt fyri at gera tollviðgerðina skjótari og lagaligari hjá privatum kundum og fyri at sleppa undan at seta fleiri fólk í starv fyri at gera hesar avgreiðslur.

Tollsatsirnir á hesum vørum verða teir somu sum á vørum yvir kr. 3000, men tað verður ikki neyðugt at fylla út upprunaváttan og tollingaráheitan fyri sendingar undir kr. 3000. Tað er í sovorðnum føri nóg mikið, at prógv fyri uppruna er stemplað á fakturan.

Kundin kann tó velja, um hann vil tolla sendingina sum sending yvir kr. 3000. Velur kundin hetta, skal hann sjálvur fylla út øll skjøl, ið skulu nýtast til tollingina.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Til kap. 1: Tolløkið

Til § 1

Talan er um eina nýggja grein í mun til fyrrverandi tolllóggávu. Greinin ásetur nærri reglur um, hvat skilst við tolløkið.

Føroysk tolllóggáva hevur higartil nevnt tolløkið sum Føroyar, uttan at seta nágreiniligari reglur fyri, hvat skilst við hesum. Nýggja uppskotið er, at tolløkið fevnir um føroyskt landøki, firðir og havleiðina við Føroyar út til 3 sjómíl frá beinum grundlinjum og loftrúmið yvir nevnda økið.

Greinin verður við hesum orðað á sama hátt sum í tollóggávunum í londum kring okkum.

Til kap. 2: Tollur, vøruskráin og upprunareglur

Til § 2.

Henda greinin er eisini nýggj, og her eru avgerandi broytingar í mun til fyrrverandi føroyska tolllóggávu. Greinin setur nærri reglur um, at tollur skal rindast fyri allar vørur, ið verða innfluttar á tolløkið, og sum ikki eru fríttiknar fyri toll smb. §§ 3 og 4.

Harnæst ásetur § 2 nærri reglur um, at ferðagóðs, flytigóðs, listaverk, forngripir, fyrimyndir, instrument sum ásett í reglunum í §§ 6 og 7 í lógaruppskotinum, kunnu innflytast uttan at rinda toll.

Til § 3.

Greinin er saman við grein 4 óivað tann mest avgerandi broytingin í tolllógini, ið verður galdandi í 1992.

Avgerandi fyri tollsatsir og tarifering, tvs. vørubólking smb. hesi tolllóg, er vøruskráin, sum er hjáløgd, og sum er partur av hesum lógaruppskotinum.

Vøruskráin er grundað á tann sokallaða nomenklaturin hjá tollsamvinnuráðnum "Harmonized Commodity Description and Coding System" og tær vanligu tariferingsreglur, ið har eru galdandi. Í vøruskránni kemur at vera yvirlit yvir:

1. GATT-toll - tað er tollur, ið verður goldin av øllum vørum, ið ikki hava uppruna í EF ella í londum, sum Føroyar ikki hava gjørt handilssáttmálar við.
2. Teir vanligu tollsatsirnir, ið Føroyar kunnu varðveita, eisini yvir fyri EF 1992.
3. Avgjald á framleiðslu og innflutning - tað eru tey gjøld, ið verða krevd við innflutning av ávísum vørum. Hetta gjald verður eisini kravt av framleiðslu av hesum vørum á tolløkinum.

Til § 4.

Reglan, ið er sett í sambandi við § 3, er nýggj og fevnir um upprunareglur. Tað er at framyvir skal diskriminerast yvir fyri vørum, ið ikki hava uppruna í EF. T.d. vilja vørur, ið hava uppruna eitt nú í Noregi, Svøríki, Japan, Íslandi ella USA í 1992 umframt vanliga tollin koma at rinda tann sokallaða GATT-tollin.

Bæði vanligur tollur og GATT-tollur eru tilskilaðir í vøruskránni. Vørur, ið ikki hava EF-uppruna, fara solciðis við nøkrum fáum undantøkum aftan á 1. januar 1992 at vera hægri tollaðar enn vørur av EF-uppruna.

Í 3. stk. kann GATT-tollur niðursetast ella fellur burtur, um handilssáttmáli verður gjørdur við onnur lond ella felagsskapir, tá ið sáttmálin er góðkendur av Føroya Løgtingi.

Til § 5

Talan er um eina nýggja grein og skal síggjast í sambandi við tær stóru útreiðslur, ið tað er at prenta vøruskráir við teimum satsum, ið eru neyðugir fyri at fyrisita tær nýggju reglurnar aftan á 1. januar 1992.

Roknast má við, at tollstovan kemur at rinda einar kr. 200.000 í fyrsta umfari til prent av vøruskrá. Haraftrat verða broytingar gjørdar í vøruskránni, fyri ein part tá ið GATT-tollurin verður broyttur, fyri ein part tá ið avgjald á framleiðslu og innflutningi verða broytt, og fyri ein part tá ið tollurin verður broyttur í 1993. Sovorðnar broytingar eru kostnaðarmiklar og skulu allar inn í vøruskránna, av tí at vøruskráin er ein partur av lógini.

Skal sleppast undan hesari cykaútreiðslu til prent av vøruskráum, er neyðugt at krevja brúkaragjald ella nýtslugjald, soleiðis at tollstovan fær heimild til at selja bøkurnar (lógirnar) til brúkararnar.

Til kap. 3: Tollfrítøka

Til § 6

Greinin ásetur, hvat kann flytast inn á tolløkið uttan at rinda toll og broyting er gjørd í § 6, f.

§ 6, a. fevnir um ferðagóðs, tvs. klæði og aðrar ferðalutir, ið ferðandi hava við, tá ið tey koma til tolløkið.

§ 6, b. fevnir um flytigóðs, tá ið eigarin flytur til tolløkið. Í sovorðnum førum kann innflutningur fara fram uttan at rinda toll, tá ið eigarin hevur búð í útlondum í meira enn 1 ár, og tá ið lutirnir bera merki av at vera brúktir.

§ 6, c. fevnir um klædnapløgg og ferðagóðs, ið onkur heimahoyrandi á tolløkinum hevur átt, sum er deyður uttan fyri tolløkið.

§ 6, d. fevnir um tól, instrument, ið listafólk brúka, og sum tey hava við, tá ið tey koma til tolløkið.

§ 6, e. fevnir um fyrimyndir og sýnislutir av annars tollskyldugum vørum, tá ið tey koma her til framsýningar, og tá ið tey ikki kunnu nýtast til annað endamál.

§ 6, f. fevnir um listaverk, forngripir og annað til almenn søvn. Her er gjørd tann broyting, at antikvitetir eru tiknir burtur úr fyri at fáa samsvar við vøruskránna. Sambært vøruskránni eru antikvitetir lutir, ið eru eldri enn 100 ár.

§ 6, g. fevnir um ortopediskar lutir, protesur, hoyritól og glaseygu.

§ 6, h. fevnir um gávupakkar. Vanligt hevur higartil verið, at gávupakkar t.d. jólagávur, føðingardagsgávur, brúdleypsgávur v.m. hava verið tollfrían, um talan kann sigast at vera um vanligar gávur, hvørs tollur lítið og einki hevur at týða. Ætlan landsstýrisins er, at greinin kemur at standa óbroytt í nýggju tolllógini.

Til § 7.

Í § 7. er gjørd tann broyting, at fyrisiting er løgd frá landsstýrinum til Føroya Tollstovu. Harnæst er gjørd tann broyting, at tollfrítøka av byggitilfari, inventari o.t. til skúlar, kirkjur, sjúkrahús er strikað.

Eisini er reglan um tollfrítøku av trygdarbúnaði, ið kravdur er á vandamiklum arbeiðsplássum, strikað, og kemur tað av, at henda regla er flutt yvir í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Orsøkin til hetta er, at praksis hevur verið, at vørur bert hava verið undantiknar innflutningsgjaldinum.

Í § 7, a er ásett tollfrítøka við eftirliti fyri tað, ið skipum og flogførum tørvar, meðan tey eru stødd á tolløkinum.

§ 7, b eru ásettar serligar reglur fyri brúktar lutir, ið innfluttir verða, sum gávur og arvur. Eisini eru serligar reglur ásettar fyri brúðarútbúning.

§ 7, c eru ásettar serligar reglur fyri lutir, ið koma higar til vask, stutt brúk og umvæling og verða fluttar útaftur. Tollfrír innflutningur kann bert veitast sum tollendurgjald við 8,33% fyri hvønn mánað, ið vørurnar hava verið á tolløkinum styttri enn 12 mánaðir.

§ 7, d er heimild til at veita tollfrítøku fyri vørur, ið eru oyðilagdar, áðrenn tollurin er rindaður.

§ 7, e er heimild til at veita tollfrían innflutning við eftirliti fyri vørur, sum aftaná at verða útfluttar av tolløkinum verða førdar aftur inn á tolløkið.

§ 7, f er heimild til at veita tollfrítøku við eftirliti fyri vørur, ið fara frá einum plássi á tolløkinum og út um tolløkið til eitt annað pláss aftur á tolløkinum.

§ 7, g er heimild til at veita tollfrítøku við eftirliti fyri motorakfør, campingvognar, flogfør og stuttleikabátar hjá persónum, ið ikki eru fastbúgvandi á tolløkinum, tá ið teir sjálvir føra hesi inn á tolløkið til brúk, meðan teir eru á tolløkinum.

§ 7, h er heimild til at veita tollfrítøku fyri tað sum diplomatar nýta, tá ið teir koma higar á almennna vitjan og fyri lutir, sum teir flyta inn sum borðfæ o.t.

§ 7, i er heimild til at veita tollfrítøku fyri lutir, eykalutir og eykaútgerð til loftfør eins og flogvenjingarútgerð og lutir, eykalutir og útgerð til hesar.

Í § 7, j eru ásettar serligar reglur um tollfrítøku, ið kann veitast fyri vørur, ið hava uppruna í menningarlondum.

Til § 8.

Tað hevur ofta verið tosað um at seta á stovn tollfrían sølubúðir á flogvøllinum; men málið er tó ongantíð komið so langt, at avgerð er tikin um hetta.

Uppskot landsstýrisins er, at tollfrían sølubúðir á flogvøllinum kunnu setast á stovn.

Sølubúðirnar skulu kunna selja innfluttar vørur, ið eru frítiknar fyri toll. Harnæst skulu sølubúðirnar selja føroyskar vørur. Hesar fáa toll afturrindaðan, tá ið tær verða seldar til sølubúðirnar.

Eisini skulu sølubúðirnar hava loyvi til at selja rúsdrekka uttan mun til føroysku rúsdrekkalóggávuna annars.

Við at gera tað møguligt bæði hjá komandi og farandi ferðafólki at keypa tollfríar vørur, metir landsstýrið, at eitt stórur partur av tí peningi, ið annars fer av landinum, verður verandi í tí føroyska samfelagnum.

Landsstýrið metir eisini, at møguleikarnir hjá føroyskum virkjum at selja vørur, ið ferðafólk vanliga keypa, skuldu batna munandi sammett við í dag.

Til kap. 4: Vørur til góðsking og vørur frá góðsking

Til § 9.

Í sambandi við umrøðuna av EF sáttmálanum hevur verið tosað um, at fiskavirkini verða verri fyri, tí at nú kann triðjalandsfiskur ikki innflytast til EF uttan at rinda triðjalands toll.

Hetta er ikki nakað nýtt. Sambært higartil galdandi skipan við EF hevur triðjalandsvøra ikki kunnað verið innflutt til EF, uttan at rinda triðjalands toll. Hetta eru rækjurnar frá Canada t.d. dømi um.

Tað, sum er nýtt, er, at sáttmálin leggur upp til, at GATT-tollur skal rindast fyri triðjalands vørur, ið koma inn á føroyskt tolløki; men tað eru ráð fyri hesum, og tey eru at geva føroyskum innflytarum av sovorðnum vørum sama møguleika, sum EF gevur teirra innflytarum av triðjalands vørum.

Uppskot landsstýrisins er tí, at vørur, ið verða innfluttar til góðskingar, kunnu flytast inn á tolløkið uttan at rinda toll.

Í 2. stk. eru ásettar reglur, um at vørur, ið verða fluttar út av tolløkinum til góðskingar, kunnu flytast inn aftur seinni við tolltætta. Hugsað verður fyrst og fremst um arbeiði, ið ikki kann gerast her á landi. Um umvæling eru ásettar reglur í § 10, 7. stk.

Til kap. 5: Tollvirðið

Til § 10.

Greinin ásetur reglur um tollvirðið. Tvs. tað virðið, ið tollur skal roknast av. Her er hend ein broyting í mun til núgaldandi tolllóggávu. Broytingin er, at tollvirðið nú er eitt cif-virði. Í núgaldandi tolllóggávu er virði í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald og løgtingslóg um eykainnflutningsgjald cif, meðan virði í løgtingslóg um innflutningsgjald er fob.

Munurin á cif og fob er, at til cif-virði skulu flutningsútreiðslur, trygging, innskipan, handfaring til innflutningsstaðið roknast við í grundarlagið, sum toll-

urin skal roknast av, meðan fob-virðið hevur við sær, at hesar útreiðslur ikki skulu leggjast til tollvirðið.

Vørurnar í løgtingslóg um innflutningsgjald so sum rúsdrekka, bensin, bustavørur, fotografiskt tilfar, instrument, radiotól, glasvørur, lampur, leikutoy og til dømis luktilsi og kosmetik hava higartil havt fob-virði; við hesari lógarbroyting koma tær at standa í lóg um avgjald, har virðið verður cif.

Í § 10, 5. stk. eru ásettar reglur um, at umrokning frá fremmandum til føroyskan pening verður gjørd eftir gjaldsoyravirðinum tann dagin, tá ið tollgreiðslan fer fram. Hetta er sostatt galdandi fyri kundar, ið ikki hava kredit. Fyri kreditkundar verður umrokning gjørd eftir gjaldsoyravirðinum, tá ið vøran er tollskyldug, smb. 6. stk.

Í § 10, 7. stk. eru ásettar serligar reglur fyri vørur, ið hava verið uttanlanda til umvælingar. Reglurnar eru tær somu, sum tær ið eru galdandi í dag, og tær eru, at tollurin av slíkum umvælingum er virðið av tilfari, ísettum lutum, arbeiðsløn og øðrum kostnaði í hesum sambandi, her íroknað cif kostnað til tollløki.

Til kap. 6: Tollskylda, tollgjald, tollviðgerð og upprunaváttan

Til § 11.

§ 11 ásetur reglur um, at tollurin er fallin til gjaldingar, so skjótt sum vøran er uppskipað á tollløkinum, ella um hon ikki verður uppskipað, tá ið vøran er komin til tollløkið.

Í § 11, 2. stk. eru ásettar serligar reglur um skyldu hjá fyritøkum og persónum. Í førum, tá ið móttakarin ikki áðrenn at hava fingið vøruna, hevur fingið kvittan frá tollvaldinum fyri, at gjaldið er rindað, skal hesin, innan 3 dagar aftaná at vørurnar eru komnar honum í hendi, siga tollvaldinum frá hesum og rinda gjaldið.

Í § 11, 3. stk. eru ásettar serligar reglur fyri vørur, ið eru her í transit. Hesar vørur sleppa undan tolli smb. treytum, ið eru ásettar av tollvaldinum.

Í § 11, 4. stk. hevur landsstýrið heimild at seta á stovn fríhavnir ella frígoymslur.

Í § 11, 5. stk. eru ásettar serligar reglur um, at vørur, ið eru tollskyldugar, bert mugu vera uppskipaðar á plássum, sum landsstýrið hevur fyriskipt.

Til § 12.

§ 12 ásetur reglur um, at vørur ikki mugu verða útflýggjaðar, áðrenn tollgreiðsla er framd, og um tær eru tollskyldugar, áðrenn tollurin er goldin. Onnur broytingin í hesari grein er, at nú mugu ongar vørur útflýggjast, áðrenn tær eru tollgreiddar. Áður fevndi greinin bert um tollskyldugar vørur. Hin broytingin er, at

skipara- ella flutningsfyritøku kann áleggjast sekt smb. § 32 í førum, tá ið viðkomandi útleverar vørurnar, hóast tollgreiðslan ikki er framd.

Í § 12, 2. stk. er gjørt eitt undantak til 1. stk. soleiðis at innflytarar av ávísum vørum kunnu fáa vørurnar beinleiðis útflýggjaðar móti at rinda tollin eftirfylgjandi móti at trygd verður veitt. Hetta er lógarheimildin viðvíkjandi kreditkundum.

2. stk. er broytt soleiðis at fyrisitingin er løgd frá landsstýrinum til Føroya Tollstovu.

3. stk. í § 12 er nýtt. Reglan gevur landsstýrinum heimild at gera reglur um eina kreditskipan, har ið vinnuligir innflytarar kunnu luttaka uttan at seta trygd, soleiðis sum neyðugt er smb. 2. stk.

Ætlan landsstýrisins er, at persónar, virki ella felløg skulu kunna fáa vørur útflýggjaðar móti at rinda eitt ávíst eykagjald av hvørjari sending.

Gjaldið, ið verður sett í ein grunn, verður ogn grunnsins og skal nýtast at taka av, tá ið landskassin hevur havt tap upp á einstakan kreditkunda.

Landsstýrið metir, at hetta kemur at lætta munandi um likviditetin hjá smáum fyritøkum, ið ikki eru førar fyri at seta trygd smb. 2. stk.

Harnæst fer tað at lætta munandi um fyrisitingina hjá Føroya Tollstovu, av tí at tollurin kann útroknast, eftir at vøran er útflýggjað, og tí at tað verða fleiri fyritøkur, ið koma at hava kredit smb. hesari skipan. Í dag hava umleið 150 fyritøkur tollkredit.

Talan verður sostatt um tvey sløg av tollkreditti. Eitt nú smb. 2. stk. og eitt nú smb. 3. stk. Kundin kann sjálvur velja, hvørja kreditskipan hann vil hava.

Til § 13.

Ein avgerandi broyting í tolllógini aftaná 1.1.92 verður, at øll tollviðgerð av innflutningi til vinnuligt endamál skal avgreiðast við einum vinnutali sum eyðmerki fyri innflytaran. Tollavgreiðslan verður framyvir grundarlag undir teimum føroysku inn- og útflutningshagtølunum við sundurliðing uppá høvuðsvinnugreinarnar.

Tollavgreiðslurnar og upplýsingar um tollkredit, rávøruloyvi, útflutningsloyvi verða knýttar at einum tali, og tá ið flestu virki frammanundan hava eitt arbeiðsgevaratal, er avgjørt, at sama talið verður nýtt sum skrásetingartal yvirfyri Føroya Tollstovu.

Í 2. stk. er ásett at virkjum, ið ikki hava eitt skrásetingartal smb. skattalógina verður tillutað eitt sovorðið tal, og at hetta talið skal nýtast í einum og hvørjum samskifti við Føroya Tollstovu.

Til § 14.

Í § 14 eru ásettar reglur um, at Líkningarráð Føroya flytur Føroya Tollstovu upplýsingar um navn, bústað, ábyrgdarhavandi, høvuðsvirki, virkisháttt, vinnu-

grein, telefonnummar hjá virkjum, ið líkningarráðið hevur skrásett smb. §§ 125 og 126 í Skattalógini. Hetta er gjørt fyri at lætta um arbeiðið hjá tollstovuni at innheinta upplýsingar.

Til § 15.

§ 15. Greinin er broytt munandi í mun til núgaldandi skipan. Í núgaldandi skipan skulu innflytarar geva tollvaldinum allar tær upplýsingar, sum skulu til fyri at fremja tollingina, tvs. faktura, farmabræv, farmagjaldsrokning v.m.

Í nógvum førum hevur tað verið soleiðis, at tollstovan hevur fylt út skjøl ella hevur hjálpt kundum at fylla út skjøl eitt nú til hagtalsfrásøgn og eitt nú til byggivinnuna, har kravt hevur verið, at vørunummarið í vøruskránni hevur verið tilskilað fyri at fáa ymiskt timbur tollað við 6%.

Samhært uppskotinum skal innflytarin fylla út og geva tollvaldinum øll skjøl og allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at fremja tollingina. Hetta kann tó hava óhepnar avleiðingar fyri kundar, ið eru privatir og fyri kundar, ið annars móttaka sendingar, ið hava lítið virði, ikki minst tí at neyðugt verður at taka vektina á vøruni í tollingargrundarlagið, av tí at talan er um ein cif-toll.

Fyri at lætta um avgreiðsluna fyri smásendingar, er uppskot landsstýrisins, at sendingar uppá kr. 3000 og undir skulu kunna avgreiðast uttan at fylt verður út upprunaváttan, tollingaráheitan og vørunummar á hvørjari einstakari vøru.

Mett verður, at verður hetta ikki gjørt, kemur tollavgreiðslan at taka munandi meiri tíð, og harvið verður neyðugt at seta fleiri fólk. Skotið verður tí upp, at tollviðgerðin av vørum uppá kr. 3.000 og undir verður gjørd einfaldari, soleiðis at sleppast kann undan meiri starvsfólki, og at kundin kann fáa vørurnar útflýggjaðar uttan at skula geva eina nágreiniliga spesifikatión av vørunum, ið eru í sendingini.

Uppskot landsstýrisins er tí, at vørur, ið hava tollvirði uppá kr. 3.000 og undir, verða avgreiddar á serligan hátt. Tað er, at tollingin kann fara fram, uttan at vørustaðfesting og tollingaráheitan er fylt út og uttan at nettovektin verður sundurgreinað upp á tær á fakturanum nevndu vørur. Tó skal uppruni verða váttaður á fakturanum.

Kundin skal tó altíð hava møguleika fyri fullari tollviðgerð, men velur hann hetta, er neyðugt, at hann fyllir út øll skjøl sjálvur, og at viðkomandi ger av, at full tolling skal gerast, áðrenn sendingin verður heintað.

Kundin skal hava boð um møguleikan fyri foreinkladari viðgerð, áðrenn sendingin verður heintað. Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur í fyriskipanum viðvíkjandi tollavgreiðslu annars.

Í 5. stk. fær landsstýrið heimild til at áseta tænastugjald, tá ið umtolling fer fram. Tænastugjald verður ásett, tá ið kundin hevur fingið vøruna tollaða, sjálvt um eitt nú upprunaskjal manglar, og vøran tí er tollað við GATT-tolli. Í førum tá

ið kundin seinni kann prógva EF-uppruna, kann vøran tollast umaftur, móti at tænastugjald verður goldið. Tað sama ger seg galdandi við umtolling av vørum uppá kr. 3.000 og undir. Hevur kundin valt foreinklaða tollviðgerð, kann hann seinni koma afturumaftur og tolla vøruna við øllum skjølum móti at gjalda tænastugjald fyri hetta.

Til § 16.

§ 16. Í 1. stk. er ásett, at tollurin verður uppkravdur eftir ásetan landsstýrisins við atstøðu frá løgreglu og postverkinum. Í 2. stk. har ið áður var ásett, at móttakarin av tollskyldugum postpakka skuldi gjalda eitt ávíst gjald til poststovnin, er gjørd tann broyting, at nýggj regla er sett í § 22, soleiðis at landsstýrið ásetur nærri reglur um tænastugjald í sambandi við tolling.

Til § 17.

§ 17 er óbroytt, og ásetur reglur um avleiðingar av, at tollurin ikki verður goldin. Í hesum føri hevur tollvaldið heimild til at selja vørurnar, ella í førum har tað ikki er loyvt at selja vørurnar á tolløkinum, at koyra vørurnar burtur ella flyta tær av tolløkinum undir tolleftirliti.

Til kap. 7: Vanligar reglur

Til § 18.

Í nýggju toll- og avgjaldsskipanini verða nógvir spurningar, ið tíðugt koma at stinga seg upp t.d. spurningar um, hvussu vørur skulu flokkast smb. vøruskránni og um, hvussu sjálv tolllógin skal tulkast.

Higartil hevur tað verið soleiðis, at landsstýrið í flestu førum hevur tikið avgerð um, hvussu tolllógin skal tulkast. Harafturímóti hevur landsstýrið ikki tikið avgerðir um vøruflokking smb. vøruskránni. Hetta hevur verið gjørt av einari sokallaðari tariferingsnevnd.

Ásannast má, at avgerðir um vøruflokking og avgerðir smb. tolllógini aftaná 1.1.92 ikki kunnu takast uttan so, at persónar kunna seg væl um nýggju skipanina.

Landsstýrið metir eisini, at tað er avgerandi neyðugt, at nýggja tolllóggávan verður fyrisitin soleiðis, at vinnulívið og einstaklingar fáa skjótar og rættar tollavgerðir. Tí verður tað hildið at vera rættast at sett verður ein nevnd, ið hevur kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti, sum skal virka sum kærunevnd fyri avgerðir, ið tollvaldið tekur. Nevndin kemur soleiðis í staðin fyri núsitandi tariferingsnevnd.

Ætlan landsstýrisins er, at kærunevndin fyrst og fremst skal taka sær av tollløgini/vøruskránni.

Haraftrat skal nevndin hava endaliga fyrisitingarliga rættin í avgerðum um avgjald á framleiðslu og innflutningi, og aftaná 1.1.93 er ætlan landsstýrisins, at

nevndin skal virka sum kærunevnd í málum eftir meirvirðisgjaldslógini. Landsstýrið ásetur nærri reglur um arbeiði og samsýning til nevndarlimirnar.

Til § 19.

Greinin er nýggj og gevur kundum, ið flyta inn vørur regluliga, møguleika til at fáa tollvaldið at taka avgerð um, hvussu vørurnar skulu flokkast smb. vøruskránni.

Hetta kann vera ein fyrimunur fyri kundan, tí um tað seinni vísir seg, at vøruflokkingin er skeiv, og at kundin tí hevur goldið ov lítlan toll, kann tollvaldið ikki koma afturumaftur og krevja kundan fyri tann ov lítlað goldna tollin. Greinin verður eisini brúkt í øðrum londum, ið tolla smb. vøruskránni.

Til § 20.

§ 20 er óbroytt í mun til áðurgaldandi tolllóggávu og ásetur reglur um, at tollur, ið er fallin til gjaldingar, kann verða innbeintaður við panting.

Til § 21.

§ 21 er broytt, soleiðis at tollvaldið nú hevur eftirlit við øllum inn- og útflutningi frá tollløkinum. Eisini kann landsstýrið áseta reglur fyri avskipan og avgreiðslu av vørum, ið verða sendar frá tollløkinum.

Til § 22.

Reglan er nýggj og gevur landsstýrinum heimild til at áseta tænastugjald fyri tollavgreiðslur. Hetta skal síggjast í sambandi við tær eyka útreiðslurnar, ið eru í sambandi við tollavgreiðslur, ið framyvir verða gjørdar á edv. Ein onnur orsøk er, at Føroya Tollstova skal prenta tollingaráheitan, vørustaðfestingar, góðsfráboðanir v.m., ið eisini kemur at vera ein eyka útreiðsla fyri stovnin. Triðja orsøk er, at gjaldið fyri postpakkar er strikað og verður sett saman við tollavgreiðslugjaldinum í hesari reglu. Umframt vanligt tollavgreiðslugjald er uppskot landsstýrisins, at gjald kann ásetast við umtolling smb. § 14, 5. stk.

Til § 23.

§ 23 er óbroytt í mun til áður galdandi tolllóggávu og ásetur serligar reglur um, at uttanlanda ferðamanna- og ferðasamband bert kann setast á stovn við loyvi frá tollvaldinum.

Til § 24.

§ 24, 1. stk. ið er óbroytt í mun til áðurgaldandi tolllóggávu, ásetur í 1. stk. serligar reglur um endurgjald fyri vørur, ið verða endursendar ella endurútfluttar ella tá ið vørur, ið eru framleiddar á tollløkinum, verða útfluttar.

Í § 24, 2. stk. eru ásettar serligar reglur um tollendurgjald til skipasmiðjur. Reglan er broytt soleiðis, at tollvaldið nú fyrisitur hesa reglu.

§ 24, 3. stk. gevur heimild til at veita virkjum samsýning svarandi til, toll latin fyri rávøru og pakkitilfar, sum virkið hevur nýtt í framleiðslu síni, ella, tá ið virkið sjálvt er innflytari av slíkum rávørum og pakkitilfari, at loyva teimum at innflyta hesar rávørur og hetta pakkitilfar, ið nýtast skal í framleiðsluni, uttan at rinda toll. Greinin er lógarheimild fyri teimum sokallaðu rávøruloyvunum ella fdnaðarloyvunum. Ætlan landsstýrisins er, at fdnaðarloyvini skulu falla burtur 31.12.92. Broytingin í hesari reglu er, at fyrisitingin er løgd til tollvaldið.

Til § 25.

Greinin ásetur, at Føroya Tollstova hevur skyldu til at hjálpa fyritøkum við at fylla út skjøl og váttanir, ið verða krevd, í førum har virki kunnu fáa fyrimun við útflutning av einum ella øðrum slagi t.d. tolllætta.

Í § 25 er fyrisitingin løgd frá landsstýrinum til Føroya Tollstovu, sum kann geva samtøkum heimild til at fylla út skjøl, ið skulu brúkast sambært 1. stk., tað er fyrst og fremst EUR 1 vørustaðfestingarnar. Hesi skjøl verða brúkt sum váttan fyri tollfyrimun eitt nú til EF.

Í § 25, 3. stk. eru ásettar serligar reglur um, at Føroya Tollstova frá vinnurekandi kann krevja upplýsingar um viðurskifti, ið hava týdning fyri kanning av skjølum um uppruna v.m., tá ið lond, ið Føroyar hava gjørt avtalu við um uppruna, tollendurgjald, v.m., vilja kanna rættleikan av hesum skjølum.

Í § 25, 4. stk. eru ásettar serligar reglur, har landsstýrið kann áseta gjøllari reglur viðvíkjandi starvi hjá nevndu myndugleikum.

Til § 26.

§ 26 gevur landsstýrinum eina generella heimild til at góðkenna alheims ella samnorrønar sáttmálar og samstarv viðvíkjandi tolli. Greinin er óbroytt í mun til áðurgaldandi tolllóggávu.

Til kap. 8: Tolleftirlit og revsing.

Reglurnar í § 27-39 eru, undantikið § 27,7 og § 33, 2. og 3. stk. óbroyttar í mun til núgaldandi tolllóggávu.

Til § 27.

§ 27 ásetur, hvat skilst við smugling. Í § 27,1 er ásett at innflutningur uttanífrá ella frá tollfríum øki av tollfríum vørum uttan frásøgn til tollvaldið er at skilja sum smugling. Eisini tað at flyta ella fara avstað við vørum av transitgoymslu uttan at siga frá hesum kemur undir smugling smb. 1. punkt.

Smb. § 27,2 stk. er brúk ella nýtsla á frígoymslu av ótolladum vørum at skilja sum smugling.

Í § 27,3 stk. er persónligt brúk ella nýtsla av ótolladum vørum á farhavnsøki, undantikið brúk av skipsvistum, sølu ella útflýggjan av tílíkum vørum til persónligt brúk, eisini at skilja sum smugling.

Í § 27,4 stk. er ófrásøgd burturflyting frá skipi ella øðrum flutningsfari av ikki tollgreiddum vørum, ella brúk av vørum, ið eru givnar upp til útflutnings móti endurrinding, eisini at rokna sum smugling.

Í § 27,5 stk. verða tollskyldugar vørur, sum koma í skipi til tolløkið, og sum ikki eru givnar upp á listaskjølum, og sum ikki eru fráboðaðar til tollvaldið, mettar sum smuglaðar inn á tolløkið.

Í § 27,6 stk. eru ásettar reglur um, at tollskyldugar vørur fyri í minsta lagi kr. 200,- umborð á skipi undir 120 tons netto, innan tolløkið, verða mettar sum smuglaðar uttan so, at góðar grundir eru fyri at halda, at skipið ikki siglir í smuglaraørindum.

Reglan í § 27,7 stk. er nýggj og verður sett, tí skuldi landsstýrið gjørt av, at serlig øki skulu gerast, sum ferðafólk kunnu fara ígjøgnum, alt eftir um tey hava nakað at geva upp fyri tollvaldinum ella ikki, so er innflutningur gjøgnum øki, ið farast skal ígjøgnum, tá ið ein ikki hevur nakað at geva upp fyri tollvaldinum, at rokna sum smugling smb. § 27,7.

Til § 28.

Í § 28 eru ásettar reglur fyri brot á reglurnar um smugling. Revsingin er bót, hefti ella fongsul upp til 2 ár. Hetta er somuleiðis galdandi fyri tann, ið selur ella á annan hátt tekur ímóti smuglaðum vørum ella sum ger royndir til tess.

Til § 29.

Í § 29 stk. eru ásettar reglur um, hvørjar avleiðingarnar fyri brot á reglur um smugling eru. Í § 29, 1. stk. er ásett, at smugling ella roynd at smugla ber í sær at tollur skal gjaldast.

Í 2. stk. er ásett at vøtur, ið innsmuglaðar eru, verða tiknar í varðveitslu av tollvaldinum. Um so er, at tollur verður rindaður innan 2 mánaðir eftir endaliga avgerð í málinum, kunnu vørurnar latast út í samsvari við tær tíl eina og hvørja tíð galdandi almennu innflutningsfyriskipanir.

3. stk. ásetur reglur um, at verður manning, førari ella bilførari tikin fyri at smugla, kann kravið gerast galdandi ímóti flutningsfarinum sum viðkomandi førari, manning ella bilførari hevur verið við. Flutningsfarið kann haldast aftur tit tollvaldið hevur fingið sítt.

Í 4. stk. eru ásettar reglur um smuglaðar vørur, sum finnast umborð á fari, sum kemur til tolløkið, uttan at nakar eigari kann sigast at vera til vørurnar. Í hesum løri kemur farið undir bót.

Til § 30.

Í § 30 eru ásettar reglur um, at tann sum yvirfyri tollvaldinum gevur skeiva frásøgn um, hvat viðkomandi hevur í farmi ella vøru, slag, mongd ella virði, kemur undir bót, uttan so at hann eftirfylgjandi prógførir, at skeivleikin stendst av viðurskiftum, sum hvørki hann sjálvur ella hann, sum hansara vegna, kundi havt nakað við at gjørt.

Í 2. stk. eru ásettar reglur um, at tann, sum gevur skeiva frásøgn við vilja til at sleppa undan tolli ella av órøttum at fáa undantaksloyvi ella endurgjald fyri toll kemur undir bót, hefti ella fongsul í upp til 6 mðr. Hetta ger seg eisini galdandi fyri tann, sum leggur fram skeiva frásøgn ella skjøl, sum eru egnað til at hava tær fylgjur, sum frammanfyri eru tilskilaðar.

Í 3. stk. eru ásettar reglur um, at verða skeivar upplýsingar givnar fyri at fáa atstøður frá viðkomandi myndugleikum ella samtøkum til at fáa útgivið skjøl, sum tilskilað er í § 25, t.v.s. EUR 1-vørustaðfesting, so koma reglurnar í 1. og 2. stk. í hesi § í nýtslu samsvarandi.

Í 4. stk. er ein uppsamlingsregla, ið sigur, at um tílík viðurskifti ikki koma undir sekt eftir §§ 27 og 28, so koma reglurnar í 1. og 2. stk. í hesari grein samsvarandi í nýtslu móti honum, sum annars til nýtslu í tollviðurskiftum gevur skeivar váttanir ella ummælir, ella villleiðandi upplýsingar, ella leggur fram skeiv ella ófullfíggjað skjøl.

Til § 31.

Í § 31 eru ásettar reglur um, tá ið tollstongsul verður brotin. Í sovorðnum førum kemur tann, sum hevur fingið vøruna undir tollstongsul undir bót, uttan so hann eftirfylgjandi prógførir, at brotið hvørki skyldast hansara ella hansara fólks eftirlæti. Hann hevur skyldu til at siga tollvaldinum frá brotinum beinanvegin.

Í 2. stk. eru ásettar reglur um, at reglan í 1. stk. er galdandi samsvarandi í førum, tá ið onkur kemur sær til vørur, sum eru undir tollstongsli, sjálvt um tollstongsulin ikki verður brotin ella skaddur.

Til § 32.

Í § 32 er ásett, at misbrúk av játtanum ella undantaksloyvum sambært tolllógini kemur undir bót, og í skerpandi førum undir hefti ella fongsul upp í 6 mánaðir. Haraftrat kann játtanin ella undantaksloyvið altíð takast aftur.

Til § 33.

Í § 33 eru ásettar serligar reglur um skyldur hjá persónum, sum koma inn um tollmark. Í sovorðnum føri skulu persónar siga frá, hvat teir hava í viðføri og so mikið, sum tollvaldið ynskir tað, opna tað til eftirlit og haraftrat geva upp, hvørjir lutir eru í.

§ 33, 2. og 3. stk. eru nýggjar reglur, ið ásseta, at landsstýrið kann gera serlig øki, ið ferðafólk kunnu fara ígjøgnum, soleiðis at hesi verða roknað sum ikki at hava nakað at geva upp fyri tollvaldinum.

Í førum, tá ið tollvaldið kannar hesar persónar, og tað vísir seg, at tey hava okkurt, ið skal tollast, verður hetta roknað sum brot á § 27, 7 t.v.s. sum smugling.

Reglan um tollfrí/-skyldug øki samsvarar við tað, ið verður gjørt í londum rundan um okkum, t.v.s. við reyðari/grønari gjøgnumgongd á flogvøllum. Hetta verður gjørt fyri at ikki alt ov stórar bíðirøðir skulu verða á tollavgreiðslustøðum.

Til § 34.

Í 2. stk. eru ásettar reglur um, at reglan í 1. stk. er galdandi samsvarandi í førum, tá ið onkur kemur sær til vørur, sum eru undir tollstongsli, sjálvt um tollstongsulin ikki verður brotin ella skaddur.

Til § 35.

§ 35 ásetur vanligar reglur um, at tollvaldið hevur rætt til at kanna persónar, sum koma og fara frá tolløkinum.

2. stk. ásetur serligar reglur um sjálva kanningina og ásetur, at tá ið tað ikki bert eru uttanáklæðini, ið skulu kannast, má eftirkanning av persóni bert gerast, um nóg góðar grundir eru fyri at halda, at viðkomandi hevur uppi á sær nakað ólógligt.

Í 3. og 4. stk. eru ásettar reglur um, at eftirkanning bert má innast eftir boðum frá yvirtollara, og í 4. stk. er ásett, at tann, ið kannar ella er hjástaddur, skal vera av sama leggi sum tann, ið eftirkannaður verður. Tann, ið eftirkannaður verður, hevur heimild til at krevja sær vitni at vera við undir eftirkanningini.

Til § 36.

§ 36 ásetur at, brot ella brotsroynd móti tolllógini ella reglum, sum eru givnar við heimild í tolllógini, koma undir bót, um so er, at í hesi lóg ella í lóggávuni annars er ikki fyrisett nøkur serstøk revsing.

Til § 37.

§ 37 ásetur reglur um konfiskatión. Her eru reglurnar í Borgarligu Revsilóg § 75 f.f. galdandi.

Til § 38.

§ 38 ásetur at brot móti lógini ella forskriftunum, sum eru givnar smb. lógini, koma undir bót eftir avgerð frá tollvaldinum, uttan so at tollvaldið ynskir sær avgerð hjá dómstólinum.

Í 2. stk. eru ásettar serligar reglur um, at bøtur, sum tollvaldið leggur á, fara í landskassan. Landskassin kann eftirgeva tílíkar bøtur, um umstøðurnar tala fyri hesum.

Í 3. stk. eru ásettar serligar reglur um, at avgerð hjá tollvaldinum kann av honum, sum er komin undir bót krevjast skotin inn til avgerðar hjá dómstólinum, tá ið tað verður kravt skrivliga innan 14 dagar frá tí at avgerðin varð tikin.

Í 4. stk. er ásett, at tollvaldið stílar fyri, at málið kemur fyri dómstólin.

Í 5. stk. er ásett, at tá ið mál ella brot móti hesi lóg verður skotið inn til dómstólin, fer tað fram sum løgreglumál.

Í 6. stk. eru ásettar reglur um, at bøtur smb. hesi lóg kunnu heintast við panting.

Til § 39.

§ 39 ásetur tær reglur, ið eru galdandi í rættargangslógini í málum smb. hesari lóg. Er ákærdi ákærdur fyri brot á reglur, ið kunnu viðføra fongsulsrevsing, skal altíð sigast honum, sum er undir ákæru, at viðkomandi hevur rætt at fáa uppnevnt verja. Persónar, sum eru hýraðir við skipi í uttanlandssigling ella persónar, sum ikki eru búgvandi í landinum, sleppa heldur ikki undan at eftirkoma avgerð frá tollvaldinum, til endalig avgerð fyriliggur frá dómstólinum, við at biðja um at fáa málið skotið inn fyri rættin.

Til kap. 9: Ígildissetan

Til § 40.

Í § 40 eru áseltar skiftisreglur. Samstundis sum henda lóg kemur í gildi, fara úr gildi løgtingslógirnar um innflutningsgjald, serligt innflutningsgjald og eyka innflutningsgjald.

Í hesum lógum, sum fara úr gildi, hava verið ymiskar serskipanir við stovnar, persónar og felløg. T.d. hevur útgerð til flogvøllin í Vágum verið innflutt uttan at rinda toll smb. avtalu millum landsstýrið og Statens Luftfartsvæsen frá 1963.

Uppskot landsstýrisins er, at allar serskipanir falla burtur.

Uppískoyti
til
álit
í

Løgtingsmálunum nr. 29/1991: Løgtingslóg um toll og nr. 30/1991: Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Fyðun Viderø, Jørgen Niclasen og Finnbogi Arge) mæla til at útseta fgildisseltingina av nýggju toll- og avgjaldsskipanini við cinum mánað og at broyta álitið samsvarandi. Hvat løgtingsmáli nr. 29/1991 viðvíkur setir meirilutin tí fram soljóðandi:

broytingaruppskot

1) Broyting nr. 3), § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis:
"Fyri vørur, ið ikki koma undir 2. ella 3. stk., skal rindast tollur sum ásett í toll - og vøruskránni".

2) Broyting nr. 49) verður orðað soleiðis:
"Sett verður inn nýggj § 41:
Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1992. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjald, løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald, løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinni broytingum um eykainnflutningsgjald, løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 um lækking av innflutningsgjøldum orsakað av skipan fyri samhandilin millum Føroyar og Felagsmarknaðin og allar serskipanir fyri persónar, feløg og stovnar sambært hesum lógum.

1) Ændring nr. 3), § 4, stk. 1 affattes således:
"Af varer, som ikke er omfattet af stk. 2 eller 3, skal svares told som fastsat i told- og varefortegnelsen".

2) Broytingar nr. 49) affattes således:
"Som ny § 41 indstættes:
Denne lov træder i kraft 1. februar 1992. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 23 fra 11. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgift, lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift, lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 med senere ændringer om ekstra indførselsafgift og lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet, samt alle særordninger for personer, selskaber og institutioner i henhold til disse love.

Stk. 2. Tær eftir løgtingslógunum, sum nevndar eru í 1. stk., givnu kunngerðir v.m. verða framvegis í gildi, í tann mun tær ikki ganga fnóti hesi lóg.

Stk. 3. Vørur, ið eru komnar til tolløkið, áðrenn henda lóg kemur í gildi, og sum ikki eru tollavgreiddar áðrenn 1. mars 1992, koma undir hesa lóg".

Stk. 2. De i henhold til lagtingslovene, som anført i stk. 1 givne bekendtgørelser m.v. forbliver fremdeles i kraft i den udstrækning, de ikke går imod denne lov.

Stk. 3. Varer, som er ankommet til toldområdet inden denne lov træder i kraft, og som ikke er toldklareret inden 1. marts 1992, er omfattet af denne lov".

Hvat løgtingsmáli nr. 30/1991 viðvíkur setir meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) Broyting nr. 11) verður orðað soleiðis:

"§ 12 verður broytt til § 13 og orðað soleiðis:

Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1992".

1) Ændring nr. 11) affattes således:

"§ 12 ændres til § 13 og affattes således:

Denne lov træder i kraft 1. februar 1992".

Hvat viðvíkur uppskoti meirilutans til løgtingslóg um innflutningsgjald setir meirilutin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

1) § 6 verður orðað soleiðis:

"Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1992".

1) § 6 affattes således:

"Denne lov træder i kraft 1. februar 1992".

II

Broyting

í

Løgtingsmáli nr. 29/1991: Løgtingslóg um toll.

§ 7, litra b. verður orðað soleiðis:

"fyri brúktar lutir, ið innfluttir verða sum gávur og hvørs tollur lítið og einki hevur at týða, og fyri aðrar lutir, ið innfluttir verða sum gávur til góðgerður-

§ 7, litra b. ændres således:

"af brugte genstande, der indføres som gaver, og for hvilke tolden er ubetydelig, og tillige af andre genstande, der indføres som gaver til brug for velgørende

feløg, ella til stovnar og tílíkt. Fyri brúktar lutir, ið innfluttir verða sum arvur. Eisini fyri brúðarútbúning, tá ið tað er persónur, sum í minsta lagi í 2 ár hevur verið búsettur í útlandi, og sum vegna giftu við persóni í tolløkinum nú flytur higar. Undantiknar fyri tílíkt tollfrælsi eru mat- og drykkjuvørur ótilgjørt tógv og manufakturvørur eins og aðrar vørur, ið ætlaðar eru til víðari viðgerð og eisini øll sløg av ráevni":

stiftelser eller for institutioner og lignende. Af brugte genstande, der indføres som arv. Endvidere af brudeudstyrsgenstande, for såvidt de er bestemt for personer, der har været bosat i udlandet mindst 2 år, og som på grund af giftermål med en i toldområdet bosat person flytter hertil. Undtaget fra sådan toldfrihed er spise- og drikkevarer, uforarbejdet garn og manufakturvarer såvel som andre til videre forarbejdning bestemte frembringelser, samt alle slags råstoffer".

III Broytingaruppskot

til

Løgtingsmál nr. 29/1991: Løgtingslóg um toll.

§ 8 í uppskoti landsstýrisins gongur út, og í staðin verður sett sum nýggj § 8:

"Landsstýrinum verður heimilað at seta á stovn tollfríar sølubúðir á flogvøllinum. Sum tollfríar vørur, ið verða seldar í slíkum vørubúðum, eru at rokna vørur, ið eru frítiknar fyri toll. Føroyskt framleiddar vørur og innfluttar vørur, ið eru tollgreiddar, kunnu fáa tollin afturrindaðan, tá ið vørur verða latnar til hesar sølubúðir. Sølubúðirnar fáa loyvi at selja vørur sambært loyvi frá landsstýrinum. Sambært fyriskipan landsstýrisins kann loyvi verða givið at selja til farandi og komandi ferðafólk. Landsstýrið ásetir í kunngerð reglur um loyvi, skipan um hvørjar vørur, ið kunnu seljast í slíkum sølubúðum, eftirlit tollvaldsins við sølubúðunum, treytir fyri starvsfólki o.s.fr. Í kunngerð við heimild í hesari lóg kann ásetast, at brot

§ 8 i landsstyrets forslag udgår, og i stedet indsættes som ny § 8:

"Landsstyret bemyndiges til at oprette toldfri butikker i lufthavnen. Som toldfri varer, der sælges i sådanne butikker skal regnes varer, der er fritaget for told. Færøsk fremstillede varer og indførte varer, der er toldberigtigede, kan få told tilbagebetalt, når varer leveres til disse butikker. Det er tilladt butikkerne at sælge varer i henhold til tilladelse fra landsstyret. I henhold til landsstyrets bestemmelser kan tilladelse gives til at sælge til ind- og udrejsende. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse bestemmelser om tilladelse, oversigt over hvilke varer, der må sælges i sådanne butikker, toldvæsenets kontrol med butikkerne, personalets vilkår o.s.v. I bekendtgørelse med bemyndigelse i denne lov kan fastsættes, at overtræd-

móti reglum í kunngerð kunnu verða revsað við bót, hefti ella fongsul upp til 1 ár, um lóggávan annars ikki ásetir strangari revsing."

elser af bestemmelser i bekendtgørelse kan straffes med bøde, hæfte eller fængsel op til 1 år, såfremt lovgivningen ellers ikke fastsætter strengere straf."

Álit

í

Løgtingsmálunum nr. 29/1991: Løgtingslóg um toll og nr. 30/1991: Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Málini vórðu løgd fram av landsstýrinum tann 7. november 1991 og vórðu við 1. viðgerð tann 19. november 1991 beind í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málini og havt fundir við landsstýrismannin í tollmálum, umboð fyri Føroya Tollstovu, fyri projektleiðsluna fyri nýggju toll- og avgjaldsskipanina, fyri Menningarstovuna, Árna Olafsson, ráðgeva hjá uttanríkisráðnum, umboð fyri Føroya Keypmannafelag, fyri Føroya Ídnaðarfelag, Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og umboð fyri eina heilsølu, ein timburhandil og eina smásølu. Eisini hevur nevndin fingið skriv frá Føroya Havbúnaðarfelag viðvíkjandi tolli á alifóðuri og heilivági til alifisk og frá Føroya Ídnaðarfelag viðvíkjandi tolli á rávøru og framleiðslu av pakkitilfari.

Nevndini varð greitt frá, at eftir sátmálanum við EF skulu Føroyar gera eina nýggja skipan viðvíkjandi avgjøldum, ið - við ávísum undantøkum - avtekur allan mismun ímillum føroyskar vørur og vørur úr EF, og sum er sambærilig við reglurnar í GATT-sáttmálanum, sum Føroyar hava verið umfatað av síðan 1954. Sáttmálin við EF kemur í gildi 1. januar 1992, og frá tí degi fáa Føroyar teir tollfyrimunir í EF, sum sáttmálin gevur. Føroyska nýskipanin fer eftir sáttmálanum fram í tveimum stigum: 1. januar 1992 seta Føroyar í gildi tolllóg, ið lýkur treytirnar hjá GATT, og 1. januar 1993 verða tey fíggjarligu innflutningsgjøldini avtikin og meirvirðisgjald og punktgjøld, ið galda eins fyri føroyskar og innfluttar vørur, sett í staðin.

Tollurin, ið nýggja tolllógin ásetur, skal vera tann sami fyri vørur úr øllum GATT-limalondum, uttan so at avtala, ið lýkur tey krøv, GATT setur til fríhandilsavtalur ella tollsamgongur er gjørd við avvarðandi lond. Ein slík avtala er sáttmálin við EF. Eisini verandi fríhandilsavtalan við Finnland lýkur hesar treytir.

Tá ið talan er um tollsatsirnar, hevur Danmark í flestu førum bundið seg til ikki at fara upp um eitt vist mark. Hetta hámark má føroyski tollurin halda seg innanfyri. Hinvegin ber heldur ikki til als ongan toll at áseta, tí at sáttmálin við EF er ein avtala, har partarnir veita hvørjum øðrum sínámillum tollfyrimunir, t.e. betri

tollsømdir enn partarnir hvør í sínum lagi geva triðjalondum. EF hevur sostatt grund til at rokna við, at føroyska tolllógin er soleiðis háttað, at hon gevur EF veruligar fyrimunir fram um triðjalond á føroyska marknaðinum.

Føroysku tollsatsirnir kunnu fyri teir einstøku vørubólkarnar vera antin null, svara til danska GATT-bundna satsin, ella vera onkustaðni harímillum. Hóast ein ávísur tollsatsur verður seltur inn í tolllógina, verður eisini heimild til tíðaravmarkaða suspensión av viðkomandi tollsatsi. Í slíkum førum skal EF sambært fríhandilsavtaluni hava fráboðan um hetta.

Viðvíkjandi EFTA-londunum upplýsti landsstýrið, at ætlanin allatíðina hevur verið, at tá ið sáttmálin við EF var avgreiddur, skuldu samráðingar takast upp við EFTA-londini um meinlíkar sáttmálar við tey, við tí í hyggju, at Føroyar kundu gerast partur av einum fríhandilsøki, ið umfatar bæði EF og EFTA-lond. Ein hevði undir samráðingunum um handilssáttmálan fingið at vita, at ætlanin var, at EFTA-lond á henda hátt kundu væntast at fáa líknandi sømdir á føroyska marknaðinum sum EF.

Góðkenningin av EF-sáttmálanum hevur drigið út, bæði í Føroyum og í EF, so nú var tíðin ov knøpp til at fáa viðurskiftini við EFTA upp á pláss áðrenn tolllógin kemur í gildi. Fyri at sleppa undan handilsavlaging í tíðini, áðrenn avtalur við EFTA-londini koma í lag, kann tað umhugsast at hava eina hóskandi suspenderingsheimild í tolllógini.

Uppá fyrispurning, hvussu tollurin skal roknast út sambært uppskotini varð svarað, at grundarlagið fyri útroknингini verður CIF. GATT-tollur verður roknaður av CIF-virðinum. Eitt 33% gjald skal eisini roknast av CIF-virðinum. Aftrat hesum kann eitt punktgjald verða roknað av CIF-virðinum + GATT-tollinum.

Landsstýrismaðurin upplýsti, at lógaruppskotini fóru at geva landskassanum meirinntøkur, um innflutningsmynstrið ikki broytist. Hetta kemst serliga av umleggingini av virðisgrundarløgunum frá FOB til CIF.

Sambært uppskotini lækka innflutningsgjøldini á rakstrargøgnum (íløgur) til ídnaðin, meðan innflutningsgjøld og møgulig punktgjøld framvegis verða roknað av cykalutum til ídnaðin.

Innflutningsgjøld av grønmeti og frukt úr EF hækkað sambært lógaruppskotinum. Sambært 1974-skipanina við EF er innflutingsgjaldið 7,8%. Eftir uppskotinum verður tað 33%.

Eftir uppskotunum skulu teir, sum lata føroyskum innflytarum vørur, vátta upprunan á vøruni. Um so er, at vøran hevur uppruna uttan fyri EF og Finland, so verður í flestu førum GATT-tollur roknaður av vøruni.

Viðvíkjandi tubakki varð serliga víst á, at 70% av vøruni skulu vera framleidd í EF fyri at lúka krøvini til uppruna har.

Sambært EF sáttmálanum ber til at gera eina skipan viðvíkjandi landbúnaðarvørum, so til ber at verja føroyskt framleiddar landbúnaðarvørur móti somu vørum framleiddar í EF. Í lógaruppskotunum er tó ongin beinleiðis heimild til at seta í verk útjavningartoll (antidumpingtoll).

Upplýst varð annars,

- at GATT-tollur av vørum, sum verða útfluttar aftur, kann verða endurgoldin.
- at tænastugjaldið sambært § 22 fyri at avgreiða tollin, var fyri certifikatir (upprunaváttanir), góðsfráboðanir o.s.fr.
- at einans innflytarar, sum nýta vøruna vinnuliga fara at verða skrásettir, og at hetta verður gjørt fyri at fáa eina skjótari avgreiðslu.

Umboðini fyri heilsøluna og timburhandilin gjørdu vart við, at teir innflyta nógv úr EFTA londunum. Fyri teir var tað tí óheppi við GATT-tollinum, tí hetta koma at dýrka um vørurnar. Umboðið fyri timburhandilin nevndi, at einans byggitilfarið til eini vanlig sethús fór at hækka í kostprísi við 6 til 8.000 kr. Tað fór ikki at liggja so væl fyri at skifta útvegarar uppá so stutta tíð. Samanumtikið kunnu uppskotini tí hava við sær hækkaðar prísir fyri vanliga brúkaran.

Umboðini fyri Føroya Keypmannafelag og smásøluna gjørdu vart við, at tað fór helst at vera ógvuliga trupult at umsita krøvini til skjalprógv fyri uppruna á vøruni. Vandi var av hesi orsøk fyri, at eitt nú útvegarar í Danmark, sum ikki eru vanir við útflutning av vørum, fóru at siga frá sær handil við smáar føroyskar innflytarur.

Nevndar vóru ávísar vørur, sum fóru at dýrka, tí tær verða fluttar inn úr triðjalondum og við hesum álagdar GATT-toll sambært lógaruppskotinum.

Umboðini vóru samd um, at tað hevði verið heppið, um møguleiki var fyri at suspendera GATT-tollin á øllum ella ávísum vørum úr eitt nú EFTA londunum.

Umboðini fyri Føroya Ídnaðarfelag søgdu seg vera greið yvir, at GATT-tollurin fór at verða innførdur, nú handilsavtalan við EF kom. Teir vóru tí bilsnir av, at landsstýrið ikki hevði tikið upp samráðingar við EFTA um frihandilsavtalu.

Teir bóru ótta fyri, at GATT-tollurin fór at hava við sær krøv um hægri lønir frá løntakarunum og við hesum hækka um kostnaðin hjá virkjunum.

Umboðini fyri Føroya Ídnaðarfelag undirstrikaðu, at tað hevur stóran týdning fyri virkini, at landsstýrið so tíðliga sum møguligt leggur fram ætlanirnar um, hvussu meirvirðisgjaldsskipanin fer at virka.

Umboðið fyri Meginfelag Sjúkrakassa Føroya vísti á, at sambært uppskotini verður ein GATT-tollur upp á 6% lagdur á heilivág. Tá meginparturin av heilivágnum til Føroya hevur uppruna uttan fyri EF, fer hetta at tyngja nógv um útreiðslurnar hjá sjúkrakassunum.

Føroya Havbúnaðarfelag vísti á, at sambært uppskotunum verður 6% GATT-tollur lagdur á heilivág til alivinnuna. Teir mintu á, at alivinnan var illa fyri og at hetta fór at kennast sum steinur oman á byrðu. Upplýst er eisini í skrivinum, at apoteksverkið hevur 40% í vinningi av sølu av heiliváti til fisk.

Landsstýrismaðurin, stýrisbólkurin fyri nýggju tollskipanina og leiðslan fyri Tollstovuna meta og mæla til, at nýggju reglurnar verða tiknar í nýtslu 1. januar 1992, meðan projektleiðslan fyri nýggju tollskipanina og serliga kunningarbólkurin og onnur starvsfólk hjá tollvaldinum eru sera ivasom, um skipanin kann takast í nýtslu frá nevnda degi.

Undir viðgerðini hevur skattanevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Eyðun Viderø, Jørgen Niclasen og Finnbogi Arge) ynskir at gera vart við, at trupulleikar fara at taka seg upp, í hvussu er tað fyrstu tíðina.

Meirilutin heldur, at tingið hevur lingið alt ov stutta tíð til at viðgera hetta málið og átalar tí, at landsstýrið hevur borið seg ov seint at. Nevndin fer somuleiðis at heita á landsstýrið um at leggja málið um meirvirðisgjald fram í so góðari tíð fyri 1. januar 1993, at møguligt verður at geva málinum eina forsvarliga og skilagóða viðgerð og setur nevndin tí fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

"Landsstýrinum verður álagt at leggja uppskotið um meirvirðisgjald fyri tingið áðrenn tingsetan 1991 endar, soleiðis at skattanevndin sum millumtinganevnd fær rímiliga tíð til viðgerð av málinum."

Meirilutin heldur, at møguleiki skal vera hjá landsstýrinum at kunna suspendera GATT-toll á vørum ella vøruhólkum frá triðjalondum, so sleppast kann undan hækkingum í toll- og avgjøldum 1. januar 1992 og ov stórari broyting í innflutningsmynstrinum.

Meirilutin hevur fingið vissu fyri, at landsstýrið beinanvegin fer at suspendera GATT-tollin á m.a. seyðakjøti, brenniolju, timbri og heiliváti, heruppí heiliváti til fisk. Slíkar suspensiónir kunnu seinni setast úr gildi. Sum dømi kann verða nevnt, at gera Føroyar ein avtalu við EFTA-londini, so kann suspensiónin av GATT-tolli uppá eitt nú timbur og brenniolju setast úr gildi, av tí at Føroyar í stóran mun keypa hesar vørur úr EFTA-londunum. Seinni kann GATT-tollurin á øðrum vørum verða suspenderaður, so hvørt umstøðurnar loyva tí.

Vísandi á, at rávøruloyvini falla burtur 31. desember 1992 mælir meirilutin til, at landsstýrið suspenderar GATT-tollin á rávørum, sum hava serligan týdning fyri føroyska framleiðslu.

Tað feska grønmeti og fruktir frá EF, sum eftir 1974-avtaluni hevði eitt innflutningsgjald uppá 7,8%, hevur í uppskoti landsstýrisins fingið innflutningsgjald uppá 33%. Meirilutin heldur, at innflutningsgjaldið skal setast niður í 8%. Konserverað grønmeti og fruktir frá EF hevði eftir 1974-avtaluni 25,8% innflutningsgjald og sambært uppskoti landsstýrisins skal tað hava 33% innflutningsgjald. Meirilutin heldur, at hetta innflutnitugsgjald skal setast niður til 10%.

Meirilutin heldur tað verða órímiligt, at apoteksverkið tekur 40% í vinningi við sølu av heilivági til fisk og heldur, at apoteksverkið eigur at seta vinningin niður á eitt rímiligari støði.

Meirilutin heldur tað ikki vera heppið, at tolllógaruppskotið eisini fevnir um innflutningsgjøld, m.a. tí, at upprunareglurnar einans eru galdandi fyri GATT-toll. Tolllógin eigur einans at fevna um GATT-toll. Mælt verður tí til, at heimild fyri innkrevjing av innflutningsgjøldum verður sett í eina lóg fyri seg, og setur meirilutin í álitinum fram uppskot samsvarandi hesum.

Fyri at landsstýrið skal kunna suspendera GATT-toll mótvegis triðjalondum er neyðugt at gera broytingar í § 4 í uppskoti landsstýrisins til løgtingslóg um toll (mál nr. 29/1991). Tað er somuleiðis hendа greinin í uppskoti landsstýrisins, sum heimilar innkrevjing av innflutningsgjøldum.

Meirilutin mælir tí til at broyta hesa greinina, so heimildin til innflutningsgjøld dettur burturúr hesi greinini at suspendera GATT-toll á vørum frá triðjalondum.

Meirilutin mælir eisini til aðrar broytingar, eitt nú at heitið "vøruskráin" verður broytt til "toll- og vøruskráin".

Mælt verður til at tilskila í § 5 í uppskotinum til tolllóg, at landsstýrið skal góðkenna gjaldið fyri toll- og vøruskráina.

Mælt verður til at seta inn eina lógarheimild hjá landsstýrinum at seta í verk útjavningartoll á eitt nú landbúnaðarvørur fyri at verja okkara egnu framleiðslu av slíkum vørum. Tiltøk, sum landsstýrið ætlar at seta í verk, skulu góðkennast av marknaðarnevndini.

Sambært sáttmálanum millum Føroyar og EF kunnu vit taka fyrivarni viðvíkjandi landbúnaðarvørum, soleiðis at tað verður møguligt at seta móttiltøk í verk um so er, at EF ketnur á marknaðin við "dumping" -prístum á landbúnaðarvørum.

Meirilutin mælir til, at hetta fyrivarni verður tikið fyri ávísar greinar og ávísar vørubólkar. Hetta verður gjørt við at seta + L aftaná avvarðandi GATT-tollsats í toll- og vøruskránni.

Hetta merkir, at móttiltøk frá føroyskari síðu eisini kunnu fevna um hækking av GATT-tollsatsunum.

Mælt verður til at útgreina reglurnar um tollvirðið í § 10, 3. stk. í uppskoti landsstýrisins, so útreiðslurnar skulu hýtast lutfalsliga uppá nettovektina á sendingini. Meirilutin heldur tó, at tollvaldið eigur at umsita hesa regluna við neyð-

ugum skyn- og varsemi, so tollgjøld, sum eftir hesi reglu verða eyðsýniliga órímilig, kunnu útroknast á annan og rímiligan hátt.

Meirilutin heldur tað vera neyðugt við neyvum ígildis- og skiftisreglum, so trupulleikar ikki verða at umsita tollløggávuna, tá skilt verður til tær nýggju reglurnar og mælir tí til at gera ískoyti til uppskotini hjá landsstýrinum. Mælt verður til, at vørur, sum eru komnar til tolløkið áðrenn 1. januar 1992 verða avgreiddar eftir gomlu reglunum, men hetta er tó treytað av, at tær verða avgreiddar áðrenn 1. februar 1992.

Meirilutin hevur skipað so fyri, at uppskot landsstýrisins til revsireglur er lagt fyri fútan til ummælis. Fútin hevur gingið uppskotið ígjøgnum og mælt til broytingar. Hesar broytingar mælir meirilutin til at samtykkja.

Meirilutin tekur undir við uppskotinum og mælir til, at tey verða samtykt við broytingum sambært umrøðuna frammanfyri og smærri málsligum broytingum og setir hvat løgtingsmáli nr. 29/1991 viðvíkur fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Yvirskriftin til Kap. 2 verður orðað soleiðis:

"Kap. 2: Tollur, toll- og vøruskráin og upprunareglur."

2) § 3, 1. stk. verður orðað soleiðis:

"Avgerandi fyri tollsatsir og tariffering er toll- og vøruskráin fyri inn- og útflutning sett upp grundað á nomenkatur tollsamvinnuráðsins "Harmonized Commodity Description and Coding System" (Tilfagaða Skipanin) og tær í toll- og vøruskránni vanligu tariferingsreglur viðvíkandi tilfagaðu skipanini."

3) § 4. verður orðað soleiðis:

"Fyri vørur, ið ikki koma undir 2. og 3. stk., skal rindast tollur sum ásett í toll- og vøruskránni.

2. stk. Fyri vørur, ið eru umfataðar av handilssáttmálanum mill um Føroyar og onnur lond ella felagsskapir, fellur tollurin burtur ella

1) Overskriften til Kap. 2 affattes således:

"Kap. 2: "Told, told- og varefortegnelsen og oprindelsesregler."

2) § 3, stk. 1 affattes således:

"Afgørende for toldsatser og tariffering er told- og varefortegnelsen for ind- og udførsel opstillet på grundlag af toldsamarbejdsrådets nomenklatur "Harmonized Commodity Description and Coding System" (HS) og de i told- og varefortegnelsen almindelige tariferingsbestemmelser vedrørende det harmoniserede system."

3) § 4 affattes således:

"Af varer, som ikke er omfattet af stk. 1 og 2, skal svares told som fastsat i told- og varefortegnelsen.

Stk. 2. Af varer, som er omfattet af handelsaftaler mellem Færøerne og andre lande eller fællesskaber, bortfalder eller nedsættes tolden i

verður lækkaður sambært landsstýrisins fyriskipan, tá ið viðkomandi sáttmáli er góðkendur av Føroya Løgting.

3. stk. Landsstýrinum verður heimilað at taka av ella seta niður toll í samsvar við GATT reglurnar ella sáttmála sambært 2. stk. annars.

4. stk. Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur um upprunareglur.

4) § 5 verður orðað soleiðis:
"Toll- og vøruskráin er til skjals og kann keypast á Føroya Tollstovu. Landsstýrið ásetir gjaldið fyri toll- og vøruskránna."

5) § 7, litra i., pkt. verður orðað soleiðis:
"fyri lutir, eykalutir og eykaútgerð til flogfør, eins og fyri flogvenjingarútgerð og fyri lutir, eykalutir og útgerð til hesar."

6) Sum nýggjur kap. 5 verður settur:
"Kap. 5: Útjavningartollur.
§ 10. Beinleiðis ella óbeinleiðis stuðul í útlondum, ið er til skaða ella má væntast at verða til skaða fyri vinnu á tolløkinum kann tálmast við at áleggja útjavningartoll.

Stk. 2. Landsstýrið tekur avgerð um nær tiltøk sambært 1. stk. skulu setast í verk og á hvønn hátt, innkrevjingin skal fara fram. Landsstýrið skal hava góðkenning frá løgtingsins marknaðarnevnd, áðrenn útjavningartollur kann áleggjast."

overensstemmelse med landsstyrets nærmere bestemmelser, når vedkommende aftale er vedtaget af Færøernes Lagting.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til at suspendere eller nedsætte told i overensstemmelse med GATT bestemmelserne eller aftale i medfør af stk. 2 iøvrigt.

Stk. 4. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler om oprindelsesregler."

4) § 5 affattes således:
"Told- og varefortegnelsen foreligger og kan købes hos Føroya Tollstovu. Landstyret fastsætter salgsprisen for told- og varefortegnelsen."

5) § 7, litra i., 1. pkt. affattes således:
"af dele, tilbehør og udstyr til luftfartøjer og flyvetræningsudstyr samt dele, tilbehør og udstyr hertil."

6) Som nyt kap. 5 indsættes:
"Kap. 5: Udligningstold.
§ 10. Direkte eller inddirekte støtte i udlandet, som er til skade eller må forventes at blive til skade for erhverv i toldområdet, kan hindres ved at indføre udligningstold.

Stk. 2. Landsstyret træffer afgørelse om, hvornår udligningstolden iværksættes og på hvilken måde opkrævningen skal foregå. Landsstyret skal indhente godkendelse fra lagtingets markedsudvalg forinden udligningstold kan opkræves."

7) Kap. 5 verður broytt til kap. 6

8) § 10 verður broytt til § 11 og 3. stk. verður orðað soleiðis:

"Hesir kostnaðir skulu leggjast afturat fakturaprísinum, um teir ikki longu eru umfataðir:

- kostnaður keyparans til provisión og innbalding,
- royalty ella licensavgjøld, sum keyparin hevur skyldu til at gjalda,
- partur av vinningi frá sølu, avhending ella nýtslu av innfluttum vørum,
- flutningskostnaður (flutningur, innskiping, handfaring og trygging) til innflutningsstaðið,
- omanfyri nevndu útreiðslur skulu býtast lutfalsliga uppá nettovektina á sendingini. Hesir kostnaðir kunnu dragast frá fakturaprísinum, treytað av, at tað týðiliga framgongur, at teir eru froknaðir í fakturanum, og treytað av, at hesir kostnaðir eru settir fyri seg sjálvar:
- flutningskostnaður aftan á innflutningsstaðið,
- kostnaður viðvíkjandi byggi-, innleggingar- og monteringsarbeiði, eins og viðlíkahaldi, og tekniskari hjálp veitt aftaná innflutning av hesum vørum,
- avsláttur,
- avgjøld á tolløkinum."

9) Nýggja § 11,5. stk. verður orðað soleiðis:

"Fyri tollavgreiðslu, ið ikki kemur undir § 13, 2. og 3. stk., verður

7) Kap. 5 ændres til kap. 6

8) § 10 ændres til § 11 og stk. 3 affattes således:

"Følgende omkostninger tillægges fakturaprisen, såfremt de ikke allerede er indeholdt deri:

- købers omkostninger til provision og emballering,
- royalty eller licensafgifter, som køberen er forpligtet til at betale,
- andel af provenu ved salg, overdragelse eller anvendelse af indførte varer,
- leveringsomkostninger (transport, lastning og håndtering samt forsikring) til indførselsstedet.
- foran anførte omkostninger skal deles forholdsmæssigt på netto vægten af leverancen. Følgende beløb kan fratrækkes fakturaprisen, såfremt det tydeligt fremgår, at de er indeholdt deri, på betingelse af, at beløbet er særskilt anført:
- transportomkostninger efter indførselsstedet,
- omkostninger vedrørende bygnings- og installation- eller monteringsarbejder, vedligeholdelse eller teknisk bistand, som er foretaget efter indførselen af de pågældende varer,
- rabatter,
- afgifter i toldområdet."

9) Ny § 11, stk. 5 affattes således:

"For toldklarering, der ikke hører under § 13, stk. 2 og 3, sker omregning fra fremmed til færøsk va-

umrokning frá fremmandum til føroyskt gjaldoyra gjørd eftir gjaldsoyravirðinum tann dagin, tá ið tollavgreiðslan fer fram."

10) Nýggja § 11, 6. stk. verður orðað soleiðis:

"Fyri vørur, ið koma undir § 13, 2. og 3. stk., verður umrokning frá fremmandum til føroyskt gjaldoyra, gjørd eftir gjaldsoyravirðinum tann dagin, tá ið vøran er tollskyldug sambært § 12.

11) Kap. 6 verður broyttur til kap. 7.

12) § 11 verður broytt til § 12. 2. stk. verður strikað. 3. stk. verður nýtt 2. stk. 4. stk. verður nýtt 3. stk. og 5. stk. verður til nýtt 4. stk.

13) § 12 verður broytt til § 13.

14) Nýggja § 13, 1. stk. verður orðað soleiðis:

"Vørur mugu ikki verða útflýggjaðar, áðrenn tollavgreiðsla er framd, og um tær eru tollskyldugar, áðrenn tollurin er goldin. Verður hetta kortini gjørt, stendur skiparin ella flutningsfyritøkan til svars fyri, at tollurin verður goldin og kann haraftrat áleggjast sekt."

15) Í nýggju § 13, 2. stk. verður orðið "skipaavgreiðsla" broytt til "útflýggjaðu."

16) Í nýggju § 13, 5. stk. verður orðið "skipaavgreiðsla" broytt til "avgreiðsla" og orðið "útflýggjaður" til "útflýggjaðu."

17) § 13 verður broytt til § 14.

18) § 14 verður broytt til § 15 og orðingin" § 13, 1. stk." skal broytast til "§ 14, 1. stk."

luta efter kursen den dag, hvor toldklareringen finder sted."

10) Ny § 11, stk. 6 affattes således:

"For varer, der hører under § 13, stk. 2 og 3, sker omregning fra fremmed til færøsk valuta efter kursen den dag, hvor varen i henhold til § 12 er toldpligtig."

11) Kap. 6 ændres til kap. 7.

12) § 11 ændres til § 12. Stykke to bortfalder. Stk. 3 ændres til nyt stk. 2, stk. 4 ændres til nyt stk. 3 og stk. 5 ændres til nyt stk. 4.

13) § 12 ændres til § 13.

14) Ny § 13, stk. 1 affattes således:

"Varer må ikke udleveres, forinden varen er klareret og hvis varen er toldpligtig, forinden tolden er betalt. Sker dette, er fartøjets fører eller transportøren ansvarlig for toldens betaling, og kan dertil pålægges bøde."

15) I ny § 13, stk. 2 ændres ordet "skibsekspediton" til "ekspedition".

16) I ny § 13, stk. 5 ændres ordet "skibsekspedition" til "ekspedition".

17) § 13 ændres til § 14.

18) § 14 ændres til § 15 og formuleringen " § 13, stk. 1" ændres til "§ 14, stk. 1".

19) § 15 skal broytast til § 16.

20) Nýggja § 16, 4. stk. verður orðað soleiðis:

"Í fyriskipanum, ið verða settar sambært 3. stk. kann ásetast, at tollviðgerð kann gerast uttan vørunummar sambært toll- og vøruskránni og uttan, at nettovektin verður sundurgreinað uppá tær á fakturanum nevndu vørur, og við at uppruni verður váttaður á fakturanum (frumskjal 2 til toll- og vørtuskránna)."

21) § 16 skal broytast til § 17.

22) § 17 skal broytast til § 18.

23) Kap. 7 verður broytt til kap. 8.

24) § 18 skal broytast til § 19.

25) Nýggja § 19, 4. stk. verður orðað soleiðis: "Nevndin hevur endaliga fyrisitingarliga avgerðarrættin í avgerðum, sum eru tiknar av Føroya Tollstovu sambært kap. 1 til 7 í hesari løgtingslóg."

26) § 19 skal broytast til § 20, og verður orðað soleiðis:

"Ein og hvør, ið regluliga flytir inn vørur, kann biðja tollvaldið um at taka avgerð um, hvar vøran skal flokkast sambært toll- og vøruskránna. Umbønin, ið skal vera skrivtlig, skal vera hjáløgd allar upplýsingar sbr. § 16, 1. stk. Avgerð tollvaldsins um vøruflokking er bindandi í 2 ár, frá tí hon er tikin."

27) § 20 skal broytast til § 21.

28) § 21 skal broytast til § 22.

29) § 22 skal broytast til § 23.

30) § 23 verður strikað.

19) § 15 ændres til § 16.

20) Ny § 16, stk. 4 affattes således:

"I medfør af de i stk. 3 fastsatte forskrifter kan fastsættes, at toldklarering kan foretages uden varenummer i henhold til told- og varefortegnelsen og uden, at opdeling af nettovægten mellem de på fakturaen anførte varer, og ved at oprindelseserklæring dokumenteres på fakturaen (bilag 2 til told- og varefortegnelsen)."

21) § 16 ændres til § 17.

22) § 17 ændres til § 18.

23) Kap. 7 ændres til kap. 8.

24) § 18 ændres til § 19.

25) Ny § 19, stk. 4 affattes således:

"Nævnet har endelig administrativ afgørelsesret i sager, hvor Færøya Toldstova har truffet afgørelser efter kap. 1 til 7 i denne lagtingslov."

26) § 19 ændres til § 20, og affattes således:

"Enhver, der regelmæssigt indfører varer, kan anmode toldvæsenet om at træffe afgørelse om, til hvilken position i told- og varefortegnelsen en vare tariferes. Anmodningen, der skal være skriftlig, skal være vedlagt alle oplysninger, jfr. § 16, stk. 1. Toldvæsenets afgørelser om tarifering er bindende i 2 år, fra beslutningsdagen."

27) § 20 ændres til § 21.

28) § 21 ændres til § 22.

29) § 22 ændres til § 23.

30) § 23 bortfalder.

31) Í § 24 verða 3. og 4. stk. strikaði.

32) Kap. 8 verður broytt til kap 9: Tolleftirlit.

33) § 27 verður orðað soleiðis:

"Tollvaldið uppkrevur toll og avgjøld á vørum, ið verða innfluttar á tolløkið ella útfluttar av tolløkinum, og ger tað neyðuga eftirlitið.

Stk. 2. Tollvaldið hevur rætt til ótarnað at ferðast alla staðni fram við strondunum, á havnum, flogvøllum og atløguplássum, og at gera eftirlit av vørum í pakkhúsum við strendur, í havnum og á flogvøllum."

34) § 28 verður orðað soleiðis:

"Skip og flogfør á tolløkinum og onnur flutningsfør, ið flyta óavgreiddar vørur, eru undir tollvaldsins eftirliti. Tollvaldið hevur rætt til at gera tær kanningar, ið eru neyðugar allastaðni í hesum flutningsførum.

Stk. 2. Skip, ið tollvaldið ætlar at kanna, og sum sigla, skulu leggja stilt, tá ið tollvaldið krevur tað.

Stk. 3. Tann, ið førir eitt av teimum í 1. og 2. stk. nevndu flutningsførum, hevur skyldu at geva og prógva tær fyri eftirlitinum neyðugu upplýsingarnar um far, manning, ferðafólk og lendingarpláss v.m., ið er umborð, og at ávísa og opna allar atgongdir til last, rúm og goymslur.

31) § 24, bortfalder stk. 3 og stk. 4.

32) Kap. 8 ændres til kap. 9: Toldkontrol

33) § 27 affattes således:

"Toldvæsenet opkræver told og afgifter af varer, som indføres i eller udføres fra toldområdet, samt fører den for toldens og afgifternes opkrævning fornødne kontrol.

Stk. 2. Toldvæsenet har ret til uhindret at færdes overalt langs kysterne, i havne, i lufthavne og på landingssteder, samt til at foretage eftersøgning af varer i pakhuse ved kyster, i havne og lufthavne."

34) § 28 affattes således:

"Skibe og fly i toldområdet og andre befordringsmidler i trafik mellem toldområdet og udlandet samt befordringsmidler, hvori der transporteres uberigtigede varer, er undergivet toldvæsenets kontrol. Toldvæsenet har ret til overalt i de nævnte befordringsmidler at foretage de undersøgelser, der er nødvendige for kontrollens udøvelse.

Stk. 2. Sejlende skibe skal på toldvæsenets forlangende stoppe op.

Stk. 3. Befordringsmidlets fører har pligt til at give og dokumentere de for kontrollens udøvelse nødvendige oplysninger om befordringsmiddel, besætning, passagerer og landing m.v. samt til at påvise og åbne eller afdække alle adgange til lasten, rum og gemmer.

Stk. 4. Uppskipan og avskipan av vørutn og ílandsetan og móttøka av ferðafólki má bert fara fram á støðum, ið eru góðkend av tollvaldinum. Tollvaldið kann tó í serligum førum, loyva at uppskipan og avskipan kunnu fara fram á øðrum støðum.

Stk. 5. Tollvaldið ásetur, hvar í landsetan av ferðafólki, ið kemur til tolløkið, kann fara fram.

Stk. 6. Tollvaldið kann krevja, at øki, har vørur verða uppskipaðar ella avskipaðar, og/ella har ferðafólk verða sett í land, verða avstongd á tørvandi hátt og uttan kostnað fyri tollvaldið, og at farast má ikki ígjøgnum sovorðin øki uttan loyvi frá tollvaldinum."

35) § 29 verður orðað soleiðis:

"Ferðandi, ið ferðast til ella frá tolløkinum skulu við komu og fráferð, uttan at biðið verður um tað, steðga til tolleftirlit og skulu annars, tá ið tollvaldið krevur tað, steðga til tolleftirlit.

Stk. 2. Persónar, ið hava verið umborð á skipum ella flogførum, ella sum ferðast fram við strondunum, í havnum, á flogvøllum og atløguplássum, skulu, tá ið tollvaldið krevur tað, steðga til tolleftirlit.

Stk. 3. Teir í 1. og 2. stk. nevndu persónar og persónar umborð á skipi og flogfari, skulu, tá ið tollvaldið krevur tað, uppgeva navn og bústað.

Stk. 4. Teir í 2. stk. nevndu persónar, ið hava verið umborð á skip-

Stk. 4. Losning og indladning af varer samt landsætning og ombordtagning af passagerer må kun finde sted i de af toldvæsenet hertil godkendte havne. Toldvæsenet kan dog, når særlige omstændigheder taler derfor, tillade, at losning og indladning finder sted andre steder.

Stk. 5. Toldvæsenet bestemmer, hvor landsætning af de til toldområdet ankommende passagerer kan finde sted.

Stk. 6. Toldvæsenet kan kræve, at der på steder, hvor varer indlades eller losses, eller hvor passagerer landsættes eller tages om bord, i fornødent omfang og uden udgifter for toldvæsenet foretages afspærringer, der ikke må passeres uden toldvæsenets samtykke."

35) § 29 affattes således:

"Personer, som rejser til eller fra toldområdet, skal ved ind- og udpassagen uopfordret standse op for toldkontrol og skal i øvrigt standse op på toldvæsents forlangende for toldkontrol.

Stk. 2. Personer, der har været ombord i skibe eller fly, eller som færdes langs kysterne, i havne, i lufthavne eller på landingssteder, skal på toldvæsenets forlangende standse op for toldkontrol.

Stk. 3. De i stk. 1 og 2 nævnte personer samt personer i skibe og fly skal på toldvæsenets forlangende opgive navn og bopæl.

Stk. 4. De i stk. 2 nævnte personer, der har været om bord i skibe

um ella flogførum, kunnu bert taka vørur frá flutningsfarinum, sum hava verið givnar upp til tollvaldið, áðrenn tær verða tiknar í land.

Stk. 5. Teir í 1. og 2. stk. nevndu persónar hava skyldu til fyri tollvaldinum, at geva fráboðan um allar vørur, ið viðkomandi hava við, og at geva tær fyri eftirlitinum neyðugu upplýsingar. Teir skulu harumframt ávísa øll rúm og goymslur í viðføri v.m. og í møguligum flutningsførum, og í tann mun tollvaldið ynskir tað, skulu teir pakka upp viðføri v.m.

Stk. 6. Tær í 5. stk. nevndu fráboðanir og upplýsingar kunnu gevast munnligt, tá ið vørurnar ikki verða innfluttar við vinnuligum endamáli, uttan so, at tollvaldið heldur tað vera neyðugt, at fráboðanirnar og upplýsingarnir skulu gevast skrivliga.

Stk. 7. Á støðum, har vavið av ferðafólkum talar fyri hesum, kann tollvaldið áseta, at persónar, ið koma til tolløkið kunnu geva fráboðan til tollvaldið við at fara fgjøgnum eftirlitsøki, har tvær gongdir eru, har onnur er merkt "ongar vørur at fráboða", og hin "vørur at fráboða". Persónar, ið fara fgjøgnum gongdina "ongar vørur at fráboða" hava við hesari gerð, fráboðað tollvaldinum, at teir ikki hava vørur við, ið eru toll- og avgjaldsskyldugar, ella vørur, ið koma undir serligar innflutningsásetanir.

eller fly, kan kun fraføre befordringsmidlet varer, som forinden fraførslen er angivet for toldvæsenet.

Stk. 5. De i stk. 1 og 2 nævnte personer har pligt til over for toldvæsenet at angive samtlige medbragte varer og til at give de for kontrollens udøvelse nødvendige oplysninger. De skal endvidere påvise alle rum og gemmer i bagage m.v. og deres eventuelle befordringsmidler samt, i det omfang toldvæsenet ønsker det, udpakke bagage m.v.

Stk. 6. De i stk. 5 nævnte angivelser og oplysninger kan afgives mundtligt, når varerne ikke indføres i erhvervsmæssigt øjemed, medmindre toldvæsenet finder det påkrævet, at angivelserne og oplysningerne afgives skriftligt.

Stk. 7. På steder, hvor persontrafikkens omfang taler derfor, kan toldvæsenet bestemme, at personer, der ankommer til toldområdet, kan foretage angivelse over for toldvæsenet ved at passere et kontorområde, som består af to kanaler, hvoraf den ene er mærket "ingen varer at angive", og den anden er mærket "varer at angive". Personer, der indpasserer gennem kanalen "ingen varer at angive", har ved denne handling angivet over for toldvæsenet, at de ikke medfører varer, der skal told- og afgiftsberigtiges, eller varer, der er under-

Stk. 8. Tollvaldið hevur heimild at seta eftir, og steðga persónum, ið bera seg undan, ella sum mugu ætlast at bera seg undan eftirliti tollvaldsins, og sum hava ella mugu ætlast at hava óavgreiddar vørur við sær. Tollvaldið hevur harumframt rætt til í sovorðnum førum, at gera eftirlit í húsum, flutningsførum v.m., tá ið hetta verður gjørt beinleiðis í sambandi við eftirsetingina."

36) § 30 verður orðað soleiðis:

"Tollvaldið hevur rætt til at eftirkanna persónar, ið ferðast til ella frá tolløkinum, sum eru ella hava verið umborð á skipum ella flogførum, ella sum ferðast fram við strondunum, í havnum, á flogvøllum ella atløguplássum.

Stk. 2. Eftirkanning av fólki skal fara fram so varliga sum gjørligt og ikki longur enn endamálið krevur tað.

Stk. 3. Eftirkanning, ið ikki bert avmarkast til uttanáklæðini, má bert gerast, tá ið nóg góðar grundir eru til at halda at viðkomandi hevur nakrar ólógligar vørur uppi á sær v.m., og bert eftir boðum frá ovasta hjáverandi tollyvirmanni. Tann, ið eftirkannaður verður, kann krevja sær vitni at vera hjá undir eftirkanningini. Til eftirkanningina krevst, at tann, ið kannar ella hjástaddur er, skal vera av sami kyni, sum

givet særlige indførselsbestemmelser.

Stk. 8. Toldvæsenet har ret til at forfølge og standse personer, der undrager sig eller antages at unddrage sig toldvæsenets kontrol, og som medfører eller antages at medføre uberigtigede varer. Toldvæsenet har endvidere ret til i sådanne tilfælde at foretage undersøgelser i huse, befordringsmidler m.v., når dette sker i umiddelbar forsættelse af forfølgelsen."

36) § 30 affattes således:

"Toldvæsenet er berettiget til at foretage eftersyn på personer, som rejser til eller fra toldområdet, som er eller har været om bord i skibe eller fly, eller som færdes langs kysterne, i havne, i lufthavn eller på landingssteder.

Stk. 2. Eftersyn på person skal ske med størst mulig hensynsfuldhed og må ikke være videregående, end de kontrolmæssige formål nødvendiggør.

Stk. 3. Eftersyn, der ikke begrænses til den ydre beklædning, må kun foretages, når der findes rimelig grund til at antage, at vedkommende ulovligt medfører varer m.v. skjult på sin person, og kun efter ordre fra den øverste tilstedeværende overordnede toldtjenestemand. Den, der eftersés, kan kræve, at eftersyn overværes af et vidne udpeget af ham. Eftersynet må udføres af og overværes af personer

tann, ið eftirkannaður er."

37) Kap. 9 verður broytt til kap. 10. Reglur um revsing.

38) § 31 verður orðað soleiðis:

"Við sekt verður hann revsaður, ið við tilætlan ella av grovum ósketni:

1. Ikki boðar tollvaldinum frá vørum, ið verða fluttar inn á ella av tolløkinum, ella vørum, ið verða fluttar inn á ella frá fríhavn, ella frígoymslu á tolløkinum, tá ið hetta er ásett í fyriskipan smb. hesi lóg.

2. Burturflytur vørur, ið er undir tollstongsli ella, sum eru á transitgoymslu.

3. Brúkar ótollaðar vøru, jbr. tó § 33.

4. Brúkar vørur, ið eru frítiknar fyri toll og avgjøld eftir § 8.

5. Selur ella á annan hátt avhendar vørur, ið eru frítiknar fyri toll og avgjøld smb. § 8, móti teimum fyri toll- og avgjaldsfrítøkuni ásettu treytum.

6. Tiknar vørur frá flutningsfari ella á annan hátt afturheldur vørur, ið eru givnar upp til útflutnings móti endurrindan av ella frítøku fyri toll og avgjøldum, ella móti fráskriving í upplag uttan at geva tað upp til tollvaldið.

af samme køn som den person, der skal efterses."

37) Kap. 9 ændres til kap. 10: Strafbestemmelser.

38) § 31 affattes således:

"Med bøde straffes den, der forsætligt eller groft uagtsomt:

1. Undlader for toldvæsenet at angive varer, der indføres til eller udføres fra toldområdet eller fraføres eller tilføres en frihavn eller et toldoplag i toldområdet, når en sådan angivelse er foreskrevet i denne lov eller i de i medfør af denne lov fastsatte forskrifter.

2. Fjerner varer, der er under toldlukke, eller som befinder sig i transitoplag.

3. Bruger eller forbruger uberigtigede varer, jfr. dog § 33.

4. Bruger eller forbruger varer, der er fritaget for told og afgifter efter § 8.

5. Sælger eller på anden måde overdrager varer, der er fritaget for told og afgifter i medfør af § 8, i strid med de for told- og afgiftsfriheden fastsatte betingelser.

6. Tilbagefører fra et befordringsmiddel eller på anden måde tilbageholder varer, der er angivet til udførsel mod godtgørelse af eller fritagelse for told eller afgifter eller fraskrivning i oplag uden at angive dette for toldvæsenet.

Stk. 2. Er gerðin framd við tilætlan til at sleppa undan at rinda toll ella avgjøld, verður hon revsað við sekt, hefti ella fongsul upp til 2 ár.

Stk. 3. Á sama hátt, sum ásett í 2. stk. verður hann revsaður, ið við tilætlan ella av grovum ósketni selur ella á annan hátt avhendar, keypir ella á annan hátt tekur ímóti, flytir ella goymir smuglaðar vørur.

Stk. 4. Brot á 1-3 stk. hevur við sær skyldu at gjalda toll- og avgjaldsupphæddina fyri vøruna."

39) § 32 verður orðað soleiðis:

"Eru toll- ella avgjaldsskyldugar vørur umborð á flutningsførum, ið eru komin til tolløkið, ið ikki eru upptiknar í farmaskjølini, og sum ikki eru fráboðaðar fyri tollvaldinum, eru vørurnar at rokna sum innsmuglaðar av ánaranum, uttan so, at tað verður prógvað, at talan ikki hevur verið um roynd at smugla.

Stk. 2. Verður komið fram á far undir 120 tons netto innan fyri tolløkið við vørum umborð, ið hava toll- og avgjaldsupphædd, ið er í minsta lagi 200 kr., er talan um roynd at smugla, uttan so at tað verður prógvað, at farið ikki siglir við smugling í hyggju."

40) § 33 verður orðað soleiðis:

"Persónlig nýtsla av vørum á fríhavnsøki, ið eru fluttar toll- og av-

Stk. 2. Er handlingen foretaget med forsæt til at undgå betaling af told eller afgifter, straffes den som smugler med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

Stk. 3. På samme måde som anført i stk. 2 straffes den, der forsætligt eller groft uagtsomt sælger eller på anden måde overdrager, køber eller på anden måde erhverver, modtager, transporterer eller opbevarer indsmuglede varer.

Stk. 4. Overtrædelse af stk. 1-3 medfører pligt til at betale de på varerne hvilende told- og afgiftsbeløb."

39) § 32 affattes således:

"Forefindes i befordringsmidler, der er ankommet til toldområdet, told- eller afgiftspligtige varer, som ikke er optaget i ladningsdokumenterne, og som ikke behørigt er angivet for toldvæsenet, anses varerne som forsøgt indsmuglet af disses ejer, medmindre denne sandsynliggør, at der ikke har foreligget forsøg på indsmugling.

Stk. 2. Træffes et fartøj på under 120 tons netto inden for toldområdet med varer om bord til et told- og afgiftsbeløb af mindst 200 kr., anses forsøg på indsmugling at foreligge, medmindre der skabes overvejende sandsynlighed for, at fartøjet ikke sejler i smuglerøjemed."

40) § 33 affattes således:

"Personligt brug eller forbrug på et frihavnsområde af varer, der er

gjaldsfrítt higar, ella móti frítøku fyri toll og avgjøld, er, undantikin loyvdari nýtslu av provianti í skipum, bannað. Keyp, móttøka, søla ella avhendan av teimum omanfyri nevndu vørum til persónliga nýtslu á einum fríhavnsøki er somuleiðis bannað."

tilført denne i uberigtiget stand eller mod fritagelse for eller godtgørelse af told og afgifter, er bortset fra tilladt forbrug af proviant i skibe, forbudt. Køb, modtagelse, salg eller levering af de foran nævnte varer til personlig brug eller forbrug på et frihavnsområde er ligeledes forbudt."

41) § 34 verður orðað soleiðis:

"Við sekt verður hann revsaður, ið uttan at gerðin kemur undir § 31 við tilætlan ella av grovum ósketni ella í fleiri førum innan fyri 2 ár, yvirfyri tollvaldinum til nýtslu í tollmálum:

1. Gevur skeiva frásøgn.
2. Leggur fram skeiv ella ófullfíggjað skjøl ella roknskapir.
3. Annars gevur tollvaldinum skeivar ella villleiðandi upplýsingar.
4. Gevur skeivar upplýsingar ella prógv fyri at fáa stuðul frá tollvaldinum ella góðkendum feløgum í sambandi við útgávu av teim í § 25 nevndu skjølum.

Stk. 2. Er gerðin framd tilætlað, at sleppa undan at rinda toll ella avgjøld, ella fyri órættvíst at fáa frítøku ella endurgjald fyri toll ella avgjøld, verður hon revsað við sekt, hefti ella fongsul upp til 1 ár, undir skerpandi umstøðum við fongsul upp til 2 ár."

41) § 34 affattes således:

"Med bøde straffes den, der, uden at forholdet er omfattet af § 31, forsætligt, groft uagtsomt eller i gentagne tilfælde inden for 2 år, over for toldvæsenet til brug i toldforhold:

1. Foretager en urigtig angivelse.
2. Fremlægger urigtige eller mangelfulde dokumenter eller regnskaber.
3. I øvrigt angiver urigtige eller vildledende oplysninger.
4. Afgiver urigtige oplysninger eller beviser for at opnå toldvæsenets eller autoriserede organisationers bistand i forbindelse med udstedelsen af de i § 25 nævnte dokumenter.

Stk. 2. Er handlingen foretaget med forsæt til at undgå betaling af told eller afgift eller for at opnå uberettiget fritagelse for eller godtgørelse af told eller afgift, straffes den med bøde, hæfte eller fængsel indtil 1 år, under skærpende omstændigheder med fængsel indtil 2 år."

42) § 35 verður orðað soleiðis:

"Við sekt, hefti ella fongsul upp

42) § 35 affattes således:

"Med bøde, hæfte eller fængsel

til 6 mánaðir, verður hann revsaður, ið uttan at gerðin fevnir um § 31, tilætlað ella av grovum ósketni:

1. Brýtur ella tekur burtur ein av tollvaldinum ásettan tollstongsul ella ger hendan nyttuleysan, ella tekur burtur av tollvaldinum ásett eyðkennismerki.
2. Ikki lýkur skyldu til at frambjóða vørur, ið eru undir tollstongsli fyri tollvaldinum."

43) § 36 verður orðað soleiðis:

"Við bót verður hann revsaður, ið tilætlað ella av grovum ósketni:

1. Ikki gevur upplýsingar, ið tollvaldið kann krevja av honum smb. § 28, 3. stk.
2. Ikki fylgir einum smb. § 27, 2. stk. ella § 28,3., 5. ella 6. stk. ásettum boði.

3. Brýtur ella roynir at bróta § 28, 2., 4. og 6. stk., og § 29, 1-3 og 5. stk.
4. Brýtur § 12, stk. 4 og § 14, stk. 1.

Stk. 2. Í fyriskipanum, ið ásettar verða smb. hesi lóg, kann revsing ásetast sum bót fyri hann, ið við tilætlan til ella av grovum ósketni brýtur reglarnar í fyriskipanunum.

Stk. 3. Tað kann áleggjast ánaranum av einum virki sekt fyri brot á §§ 34 og 35 og 1. stk. í hesi §, um brotsgerðin verður framd vegna virkið, sjálvt um brotsverkið ikki kann roknast ánaranum sum tilætlað ella ósketni. Er virkið eitt partafelag,

indtil 6 måneder straffes den, der, uden at forholdet er omfattet af § 31, forsætligt eller groft uagtsomt:

1. Bryder eller fjerner eller gør uvirksomt et toldlukke eller identitetsmærke, der er anbragt af toldvæsenet.

2. Undlader at opfylde en pligt til at frembyde varer, der er under toldlukke, for toldvæsenet."

43) § 36 affattes således:

"Med bøde straffes den, der forsætligt eller groft uagtsomt:

1. Undlader at give oplysninger, som toldvæsenet kan afkræve ham efter § 28, stk. 3,
2. Undlader at efterkomme et i medfør af § 27, stk. 2, eller § 28, stk. 3, 5 eller 6 meddelt påbud.
3. Overtræder eller forsøger at overtræde § 28, stk. 2, 4 og 6, og § 29, stk. 1-3 og 5.
4. Overtræder § 12, stk. 4 og § 14, stk. 1.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for den, der forsætligt eller groft uagtsomt overtræder bestemmelserne i forskrifterne.

Stk. 3. Der kan pålægges en virksomheds ejer bødeansvar for overtrædelse af §§ 34 og 35 og denne paragrafs stk. 1, hvis overtrædelsen begås på virksomhedens vegne, selv om overtrædelsen ikke kan tilregnes ejeren som forsætlig eller

lutafelag ella tílíkt, kann felagnum áleggjast ein sektarábyrgd. Umskiftisrevsing verður ikki ásett."

44) § 37 verður orðað soleiðis:

"Verður mett, at brotsgerðin ikki vil bera við sær harðari revsing enn bót, kann tollvaldið boða viðkomandi frá, at málið kann avgerast uttan rættarsókn, um hann játtar seg sekan í brotsgerðini og játtar at gjalda eina ásetta bót innan eina ásetta freist, ið eftir áheitan kann framleggjast.

Stk. 2. Sektir, ið tollvaldið áleggur, fara í landskassan. Landsstýrið kann tó eftir fyriliggjandi umstøðum lætta um ella eftirgeva tílíkar sektir.

Stk. 3. Honum, ið avgerðin viðvíkur, kann innan eina freist, ið er 14 dagar aftaná at avgerðin er kunngjørd honum, krevja avgerðina skotna inn fyri Føroya rætt. Avgerðin skal innihalda upplýsingar hesum viðvíkjandi. Tollvaldið stílar fyri at málið kemur fyri rættin. Persónar sleppa ikki undan at gera eftir avgerð tollvaldsins til avgerð fyriliggur frá dómstólinum, við at biðja um at fáa málið skotið inn fyri rættin.

uagtsom. Er virkomheden et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar. Der fastsættes inden forvandlingsstraf."

44) § 37 affattes således:

"Skønnes en overtrædelse ikke at ville medføre højere straf end bøde, kan toldvæsenet tilkendegive den pågældende, at sagen kan afgøres uden retslig forfølgning, såfremt han erkender sig skyldig i overtrædelsen og erklærer sig rede til inden for en nærmere angivet frist, der efter begæring kan forlænges, at betale en i tilkendegivelsen angivet bøde.

Stk. 2. Bøde pålagt af toldvæsenet tilfalder landskassen. Landsstyret kan efter foreliggende omstændigheder nedsætte eller eftergive de af toldvæsenet pålagt bøder.

Stk. 3. Den, som afgørelsen vedrører, kan inden for en frist af 14 dage efter, at afgørelsen er meddelt ham, kræve den indbragt for Færøernes ret. Afgørelsen skal indeholde oplysning om adgangen til domstolsprøvelse og om fristen herfor. Sagens indbringelse for retten foranlediges af toldvæsenet. Den pågældende kan ikke ved at kræve sagen indbragt for domstolene befri sig for forpligtelse *til* at efterkomme toldvæsenets afgørelse, *indtil* rettens afgørelse måtte foreligge.

Stk. 4. Viðvíkjandi teirri í 1. stk. nevndu fráboðan galda reglurnar í rættargangslógini um innihaldið í ákæruriti í løgreglusakum á sama hátt.

Stk. 5. Verður sektin goldin rættstundis, ella verður hon eftir samtykt innheintað ella avsitin, fellur framhald av rættarsókn burtur. Sektir kunnu heintast inn við útpanting.

Stk. 6. Mál viðvíkjandi broti á § 31 og §§ 34-36 verða viðgjørdar sum løgreglumál. Rættarráðini í kap. 69-70 og 72-73 í rættargangslógini, kunnu nýtast í sama vavi sum í statsadvokatmálum."

45) § 38 verður orðað soleiðis:

"Loyvi, sum tollvaldið hevur játtað, kunnu takast aftur um so er, at virksemi sambært hetta loyvi hevur við sær brot á hesa lóg ella fyriskipanir ásettar sambært hesa lóg."

46) § 39 verður orðað soleiðis:

"Vørur, ið finnast undir smugling ella roynd til tess, ella við kanning sambært § 29, 8. stk. verða tiknar í varðveitslu av tollvaldinum ella av løgregluni tollvaldsins vegna. Annars kunnu innsmuglaðar vørur ella aðrar vørur, sum tollur og avgjøld ikki eru rindaði av ella roynt hevur verið at sloppið undan at rinda toll og avgjøld av, takast í varðveitslu, ella hald kann leggjast á tær av teimum nevndu myndugleikunum undir teimum treytum, ið eru ásett-

Stk. 4. Med hensyn til den i stk. 1 nævnte tilkendegivelse finder bestemmelsen i retsplejeloven om indhold i anklageskrift i politisager tilsvarende anvendelse.

Stk. 5. Betales bøden i rette tid, eller bliver den efter vedtagelse inddrevet eller afsonet, bortfalder videre forfølgning. Bøder kan inddrives ved udpantning.

Stk. 6. Sager angående overtrædelse af § 31 og §§ 34-36 behandles som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitler 69-70 og 72-73 kan anvendes i samme omfang som i statsadvokatsager."

45) § 38 affattes således:

"I tilfælde, hvor der ved overtrædelse af denne lov eller de i medfør af loven fastsatte bestemmelser er gjort brug af en af toldvæsenet meddelt bevilling eller tilladelse, kan bevillingen eller tilladelsen inddrages."

46) § 39 affattes således:

"Varer, der forefindes under smugleri eller forsøg herpå eller i forbindelse med undersøgelse efter § 29, stk. 8, tages i bevaring af toldvæsenet eller af politiet på toldvæsenets vegne. Iøvrigt kan indsmuglede varer eller andre varer, med hensyn til hvilke told eller afgift er unddraget eller søgt unddraget det offentlige, tages i bevaring eller beslaglægges af de nævnte myndigheder under iagttagelse af de i §§ 782 og 783 i lov om rettens

ar í rættargangslógini § 782 og 783 um haldlegging á lutum, ið mettir verða at skula konfiskerast."

Stk. 2. Tá ið skyldugar toll- og avgjalds og sektarupphæddir og sakarmálskostnaður eru goldnar, verða vørur, sum eru tiknar í varðveitslu, ella sum hald er lagt á, undir tí fyrivarni at tær vanligu innflutingstreytirnar eru loknar, útflýggjaðar honum, ið tær eru tiknar í varðveitslu frá ella lagdar hald á hjá øðrum, ið prógva at hava rætt til vørurnar. Eru vørurnar ikki heintaðar áðrenn 2 mánaðar eftir at tann mánaðurin er endaður, sum málið er endaliga avgjørt í, verða vørurnar seldar av tollvaldinum á uppboðssølu til fremja fyri landskassan. Vørur, ið eftir tollvaldins metan ikki kunnu seljast, kunnu tó, eftir at freistin er útgingin, verða oyðilagdar undir eftirliti. Av tí upphædd, sum er innkomin av uppboðssøluni, verða fyrst tær almennu útreiðslurnar av goymslu og sølu og hereftir skyldugar toll- og avgjaldsupphæddir og sektarupphæddir og sakarmálskostnaður goldnar. Eitt møguligt yvirskot verður útgoldið ánaranum, um hann ger vart við seg, áðrenn 3 ár eftir uppboðssøluna og prógvar sín ognarrætt til tær seldu vørurnar.

Stk. 3. Tollvaldið kann smb. umsókn leingja ta í 2. stk. 2. pkt. nevndu freist, tó hægst til 1 ár.

Stk. 4. Viðvíkjandi trygd og innheintan av sektarkrøvum og sakar-

pleje fastsatte regler om beslaglæggelse af ting, der findes at burde konfiskeres.

Stk. 2. Når skyldige told- og afgifts og bødebeløb og sagsomkostninger er betalt, udleveres varer, der er taget i bevaring eller beslaglagt, under iagtagelse af de gældende almindelige indførselsforskrifter til den, hos hvem de er taget i bevaring eller beslaglagt, eller til anden, der godtgør at være berettiget til varerne. Er varerne ikke afhentet inden 2 måneder efter udløbet af den måned, i hvilken sagen er endelig afgjort, bortsælges de af toldvæsenet til fordel for landskassen. Varer, der efter toldvæsenets skøn er ukurante eller urealisable, kan dog efter fristens udløb destrueres under toldkontrol. Af salgsprovenuet dækkes først det offentliges omkostninger ved opbevaring og salg og derefter skyldige told-, afgifts- og bødebeløb og sagsomkostninger. Et eventuelt overskud udbetales til ejeren, såfremt han melder sig inden forløbet af 3 år fra bortsalget og behørigt godtgør sin ejendomsret til de bortsolgte varer.

Stk. 3. Toldvæsenet kan efter ansøgning forlænge den i stk. 2. 2. pkt. nævnte frist, dog højst til 1 år.

Stk. 4. Med hensyn til sikring og inddrivelse af bødekrav og sagsom-

málskostnaði er 2. stk. bert galdandi við teimum avmarkingum, ið eru ásettar í borgarligu revsilóg § 76 viðvíkjandi konfiskatión smb. somu lóg § 75, 2. stk."

47) § 40 verður orðað soleiðis:

"Flutningsfør, ið hava verið nýtt til innsmugling ella roynd til innsmugling av vørum ella til flutning av sovorðnum innsmuglaðum vørum á tolløkið, kunnu haldast aftur av tollvaldinum ella av løgregluni tollvaldsins vegna, til tær toll- og avgjaldsupphæddir og sakarmálskostnaður, ið skyldast av ánara ella skipara, manning ella øðrum í tænastu á flutningsfarinum, eru goldnar, ella trygd veitt fyri hesum. Hendir hetta ikki áðrenn 2 mánaðar aftan á, at málið er endaliga avgjørt, kann ágóðin innheintast í flutningsfarinum.

Stk. 2. Viðvíkjandi heimildini hjá nevndu myndugleikum at afturhalda eru tær í rættargangslógini §§ 782 og 783 fastsettu reglur um haldlegging av lutum, ið mettir verða at skula konfiskerast, samsvarandi galdandi. Afturhaldan kann bert fremjast, tá hetta er neyðugt fyri at tryggja at nevndu upphæddir verða goldnar. Hevði hann, ið hevði ræði yvir flutningsfarinum, tá ið tað var nýtt til innsmugling v.m., ikki rætt til at nýta tað, kann afturhaldan ikki fremjast."

48) Sett verður inn nýtt kap. 11: Ígildis

kostninger finder stk. 2 kun anvendelse med de begrænsninger, som er fastsat i borgerlig straffelovs § 76 vedrørende konfiskation efter samme lovs § 75, stk. 2."

47) § 40 affattes således:

"Befordringsmidler, der har været anvendt ved indsmugling eller forsøg på indsmugling af varer eller til befordring af sådanne indsmuglede varer i toldområdet, kan tilbageholdes af toldvæsenet eller af politiet på toldvæsenets vegne, indtil de told-, afgifts- og bødebeløb og sagsomkostninger, der er forskyldt af ejeren eller af fører, mandskab eller andre i tjeneste på befordringsmidlet, er betalt, eller der er stillet sikkerhed for betalingen. Sker dette ikke inden 2 måneder efter sagens endelige afgørelse, kan der søges fyldestgørelse i befordringsmidlet.

Stk. 2. Med hensyn til de nævnte myndigheders iværksættelse af tilbageholdelsen finder de i §§ 782 og 783 i lov om rettens pleje fastsatte regler om beslaglæggelse af ting, der findes at burde konfiskeres, tilsvarende anvendelse. Tilbageholdelse kan kun ske, såfremt det er påkrævet for at sikre betalingen af de nævnte beløb. Var den, der havde rådighed over befordringsmidlet under dettes benyttelse ved indsmugling m.v. uberettiget i besiddelse af det, kan tilbageholdelse ikke ske."

48) Nyt kap. 11: Ikrafttræden og over-

setan og skiftisreglur.

49) Sett verður inn nýggj § 41:

"Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1992. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjald, løgtinglóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald, løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinni broytingum um eykainnflutningsgjald, løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 um lækking av innflutningsgjøldum orsakað av skipan fyri samhandilin millum Føroyar og Felagsmarknaðin og allar serskipanir fyri persónar, feløg og stovnar smb. hesum lógum.

Stk. 2. Tær eftir løgtingslógunum, sum nevndar eru í 1. stk., givnu kunngerðir v.m. verða framvegis í gildi, í tann mun tær ikki ganga ímóti hesi lóg.

Stk. 3. Vørur, ið eru komnar til tolløkið, áðrenn henda lóg kemur í gildi, og sum eru tollavgreiddar áðrenn 1. februar 1992, koma undir hesa lóg."

gangsregler, indsættes.

49) Som ny § 41 indsættes:

"Denne lov træder i kraft 1. januar 1992. Samtidig træder ud af kraft lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgift, lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift, lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 med senere ændringer om ekstra indførselsafgift og lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet, samt alle særordninger for personer, selskaber og institutioner i henhold til disse love.

Stk. 2. De i henhold til lagtingslovene, som anført i stk. 1, givne bekendtgørelser m.v. forbliver fremdeles i kraft i den udstrækning, de ikke går imod denne lov.

Stk. 3. Varer, som er ankommet til toldområdet inden denne lov træder i kraft, og som ikke er ekspederet inden 1. februar 1992, er omfattet af denne lov."

Hvat løgtingsmáli nr. 30/1991 viðvíkur setur meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verða "60 vektprosent" broytt til "60 rúmprosent" og "5,57 rúmprosent" broytt til "5,8 rúmprosent".

2) § 2 verður orðað soleiðis:

"Fyri vørur, ið verða innfluttar,

1) I § 1 i landsstyrets forslag ændres "60 vægtprocent" til "60 rumprosent" og "5,57 rumprocent" til "5,8 rumprocent".

2) § 2 affattes således:

"For indførsel af varer, skal betal-

skal rindast avgjald til landskassan sum ásett í frumskjal 1 (avgjald á innflutningi) til toll- og vøruskránna."

3) § 3 verður orðað soleiðis:

"Tað er ikki loyvt at framleiða tær í toll- og vøruskránni (frumskjal 1) 2204-2208 nevndu vørur og at framleiða øl, sum í sær hevur yvir 5,8 rúmprosent av alkoholi."

4) § 4 verður orðað soleiðis:

"Fyri vørur, ið við vinnuligum endamáli verða framleiddar til sølu, skal rindast avgjald til landskassan, sum ásett er í frumskjali 1 (avgjald á framleiðslu) til toll- og vøruskránna."

5) § 6 verður orðað soleiðis:

"Fyri vinnuliga framleiðslu á tolløkinum av øðrum vørum enn tær í frumskjali 1 (avgjald á innflutningi) nevndu vørum, kann landsstýrið áseta gjald, sum fyri innfluttar vørur."

6) § 8 verður orðað soleiðis:

"Tollvaldinum verður heimilað at játta afturrindan av teimum goldnu framleiðsluavgjøldunum, tá ið vørurnar verða útfluttar frá tolløkinum ella til tær í § 8 í løgtingslóg um toll nevndu sølubúðir."

7) § 9 verður orðað soleiðis:

"Reglurnar í løgtingslóg um toll, tó ikki § 4, galda samsvarandi sambært hesi lóg.

2. stk. Avgjaldsskylduga virðið sambært kap. 1 er tollskylduga virðið íroknað toll."

8) § 10 verður orðað soleiðis:

es afgift til landskassen som fastsat i bilag 1 (afgift af indførsel) til told- og varefortegnelsen."

3) § 3 affattes således:

"Fremstilling af de i told- og varefortegnelsen (bilag 1) 2204-2208 nævnte varer og fremstilling af øl, der indeholder over 5,8 rumprocent alkohol, er ikke tilladt."

4) § 4 affattes således:

"For varer, der fremstilles i erhvervsmæssigt øjemed beregnet til salg, skal der betales afgift til landskassen, som fastsat i bilag 1 (afgift af fremstilling) til told- og varefortegnelsen."

5) § 6 affattes således:

"Af erhvervsmæssig fremstilling inden for toldområdet af andre end de i bilag 1 (afgift af indførsel) nævnte vare, kan landsstyret fastsætte afgift som for indførte varer."

6) § 8 affattes således:

"Toldvæsenet bemyndiges til at bevilge refundering af betalte fremstillingsafgifter, når varerne udføres fra toldområdet eller til de i § 8 anførte butikker i lagtingslov om told."

7) § 9 affattes således:

"Bestemmelserne i lagtingslov om told, dog ikke § 4, finder tilsvarende anvendelse i denne lov.

Stk. 2. Den afgiftspligtige værdi i henhold til kap. 1 er den toldpligtige værdi inklusive told."

8) § 10 affattes således:

"Tollvaldinum verður sambært hesi lóg heimilað undir eftirliti at veita avgjaldsfrían innflutning av trygdarbúnaði, ið krevdur er á vandamiklum arbeiðsplássum."

9) Sum nýggj § 11 verður sett:

"Tollvaldið hevur heimild til at veita skipasmiðjum samsýning svarandi til avgjaldið fyri avgjaldsskyldugt tilfar, ið nýtt er til bygging av nýggjum skipum, bátum og førum, eisini til at afturrinda avgjald av tilfari o.t., ið nýtt er til umvæling ella umbygging av skipum, bátum og førum.

Stk. 2. Somuleiðis hevur tollvaldið í serstøkum førum heimild at veita øðrum virkjum samsýning svarandi til avgjald, ið er latið fyri råvørur og pakkitilfar, sum virkið hevur nýtt í framleiðslu síni, ella, tá ið virkið sjálvt er innflytari av slíkum råvørum og pakkitilfari, at loyva teimum at innflyta hesar råvørur og hetta pakkitilfar, ið nýtast skulu í framleiðsluni, uttan at rinda avgjald",

10) § 11 verður broytt til § 12 og orðað soleiðis:

"Brot á §§ 1, 3 og 4 verða revsað við sekt, hefti ella fongsul upp til 1 ár."

11) § 12 verður broytt til § 13.

"Toldvæsenet bemyndiges i medfør af denne lov til under kontrol at bevilge afgiftsfri indførsel af sikkerhedsbeklædning, der er påkrævet på farlige arbejdspladser."

9) Ny § 11 indsættes og affattes således:

"Toldvæsenet er bemyndiget til at yde skibsværfter en til afgiften svarende godtgørelse for de til nybygninger af skibe, både og fartøjer anvendte toldpligtige materialer samt tilbagebetaling af den erlagte afgift af materialer m.v., der er anvendt ved reparation eller ombygning af skibe, både og fartøjer.

Stk. 2. Ligeledes bemyndiges toldvæsenet til i særlige tilfælde at yde andre virksomheder godtgørelse svarende til afgift erlagt for råvarer og emballage, virksomheden har anvendt i produktionen, eller når virksomheden selv er importør af sådanne råvarer og emballage, at give dem tilladelse til at indføre disse råvarer og emballage, som skal anvendes i produktionen, uden at erlægge afgift".

10) § 11 ændres til § 12 og affattes således:

"Overtrædelse af §§ 1, 3 og 4 straffes med bøde, hæfte eller fængsel op til 1 år."

11) § 12 ændres til § 13.

Meirilutin setur fram soljóðandi:

uppskot

til

løgtingslóg um innflutningsgjald

§ 1.

Fyri vørur, ið verða innfluttar á tolløkið, skal rindast innflutningsgjald, sum ásett í toll- og vøruskránni.

§ 2.

Tær í løgtingslóg um toll ásettu reglur, tó ikki § 4, galda samsvarandi sambært hesi lóg.

§ 3.

Í 1992 fær tollvaldið heimild til at tollavgreiða vørur, ið eftir higartil galdandi skipan sambært løgtingslóg nr. 9 frá 27. aprfl 1961 við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinni broytingum, hava verið fríttknar fyri serligt og eykainnflutningsgjald.

Stk. 2. Treytin fyri avgreiðslu sambært 1. stk. er, at vørurnar ikki kunnu bólkast sambært toll- og vøruskránni og at innflytarin váttar, at vørurnar lúka tær í 1. stk. nevndu treytir.

§ 4.

Tollvaldið hevur heimild til at veita skipasmiðjum samsýning svarandi til innflutningsgjaldið fyri tilfar, ið nýtt er bygging av nýggjum skipum, bátum og førum, eisini til at afturrinda innflutningsgjald av tilfari, o.l., ið nýtt er til umvæling ella umbygging av skipum,

§ 1.

For varer, som importeres til toldområdet, skal betales indførselsafgift, som fastsat i told- og varefortegnelsen.

§ 2.

De i lagtingslov om told fastsatte bestemmelser, med undtagelse af § 4 finder tilsvarende anvendelse i denne lov.

§ 3.

Toldvæsenet bemyndiges i 1992 til at toldekspedere varer, som i henhold til hidtil gældende praksis jfr. reglerne i lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer og lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 med senere ændringer, har været fritaget for særlig og ekstra indførselsafgifter.

Stk. 2. Betingelsen for ekspedition i henhold til stk. 1 er, at varerne ikke kan identificeres i medfør af told- og varefortegnelsen, og at importøren erklærer, at varerne opfylder de i stk. 1 nævnte betingelser.

§ 4.

Toldvæsenet er bemyndiget til at yde skibsværfter en til indførselsafgiften svarende godtgørelse for de til nybygninger af skibe, både, og fartøjer anvendte afgiftspligtige materialer samt tilbagebetaling af den erlagte indførselsafgift af materialer m.v. der er anvendt

bátum og førum.

Stk. 2. Somuleiðis hevur tollvaldið í serstøkum førum heimild at veita øðrum virkjum samsýning svarandi til innflutningsgjald, ið er latið fyri rávørur og pakkitilfar, sum virkið hevur nýtt í framleiðslu síni, ella, tá ið virkið sjálvt er innflytari av slíkum rávørum og pakkitilfari, at loyva teimum at innflyta hesar rávørur og hetta pakkitilfar, ið nýtast skulu í framleiðsluni, uttan at rinda innflutningsgjald.

§ 5.

Fyri motorakfør, ið eru skrásett sum hýru og/ella skúlavognar frá 24. mai 1991 til og við 14. oktober 1991, og sum koma undir løgtingslóg nr. 29 frá 7. mai 1991 um broyting í løgtingslóg um serligt innflutingsgjald § 1, 2. stk., nr. 3, verður serliga innflutningsgjaldið afturgoldið eftir nærri reglum ásettum av landsstýrinum.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1992.

ved reperation eller ombygning af skibe, både og fartøjer.

Stk. 2. Ligeledes bemyndiges toldvæsenet til i særlige tilfælde at yde andre virksomheder godtgørelse svarende til indførselsafgift, erlagt for råvarer og emballage, virksomheden har anvendt i produktionen, eller når virksomheden selv er importør af sådanne råvarer og emballage, at give dem tilladelse til at indføre disse råvarer og emballage, som skal anvendes i produktionen, uden at erlægge indførselsafgift.

§ 5.

For motorkøretøjer, som er registreret som hyre og/eller skolevogne fra 24. maj 1991 til og med 14. oktober 1991, og som er omfattet af lagtingslov nr. 29 af 7. maj 1991 om ændring i lagtingslov om særlig indførselsafgift § 1, stk. 2 nr. 3, skal den særlige indførselsafgift tilbagebetales efter nærmere regler fastsat af landsstyret.

§ 6.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1992.

Eitt spurningur, sum hevur verið umrøddur fleiri ferðir undir viðgerðini, eru krøvini um nýtslu av skjølunum EUR 1 og EUR 2 í samband við upprunaváttan. Komið er fram, at onnur lond, sum eru í ella hava handilssamband við EF, sleppa undan at nýta hesi skjøl.

Meirilutin heldur, at landsstýrið eigur at gera nakað við hendan spurning og setur tí fram soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

"Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við EF við tí fyri eyga, at broyta avtaluna um nýtslu av EUR 1 og EUR 2, so føroysku reglurnar koma at samsvara teimum reglum, sum galda í øðrum londum".

Umframt hesi uppskot og broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins mælir meirilutin til at gera ymiskar broytingar í teimum uppskotnu GATT-tollsatsunum, innflutningsgjøldunum og punktgjøldunum. Hesar broytingar ganga fram av hjálagda fylgiskjali 3. Fylgiskjal 1 er frumskjal 1 í rættaðum líki og fylgiskjal 2 er frumskjal 2, somuleiðis í rættaðum líki.

Minnilutin (Lasse Klein) førir fram, at nevndin fekk tvey so mikið illa fyrireikaði uppskot til viðgerðar frá landsstýrinum, at tey tvey uppskotini eru vorðin til trý uppskot. Í høvuðsheitum kann sigast, at talan er um so stórar og grundleggjandi broytingar, at uppskotini undir einum áttu at fingið eina nýggja 1. viðgerð í tinginum, ella átti nevndin, soleiðis sum minnilutn mælir til, at biðið landsstýrið tikið uppskotini aftur og viðgera tey av nýggjum.

Tað er komið týðuliga fram, at hvørki umsiting ella starvsfólk eru til reiðar ella hava fingið neyðuga útbúgving. Eingin upplæring er farin fram enn, einki arbeiðsbýti er gjørt, eingin tíð er til innkoyring av nýggju skipanini, og so at siga er eingin fyrireiking farin fram enn, sum fyrireikar innflytararnar uppá broyttu umstøðurnar.

Uppseting av EDV-tólum er júst byrjað og bert í fáum tollbúðum kring landið er arbeiðið liðugt, meðan arbeitt verður við at fáa tólini uppsett í hinum tollbúðunum.

Í statusfrágreiðing frá projektleiðsluni fyri nýggju tollskipanina verður sagt, at "projektleiðslan er av tí fatan, at ein avmarkað skipan tekniskt kann verða tøk at nýta pr. 1. januar 1992. Men eitt er teori og eitt annað er praksis. Tí í praksis kann tann tørvandi kunnleikin og vantandi upplæringin koma at skapa stórar trupulleikar. Tær nógvu broytingarnar í arbeiðsgongdunum á Tollstovuni gera tað neyðugt, at starvsfólki hevur ein møguleika fyri at umstilla seg psykologiskt til nýggju skipanina, og hetta verður ongin tíð til" sigur projektleiðslan.

Beinleiðis og óbeinleiðis hevur verið sagt undir viðgerðini av almennum starvsfólkum, at tað er fullkomiliga ábyrgdarleyst at seta skipanina í gildi frá 1. januar 1992. Sama sjónarmið hava allir teir innflytarar, sum nevndin hevur tosað við, og koma tolllógirnar í gildi 1. januar 1992, sum ætlað, vænta teir sannan ruðuleika á tollløkinum. Fleiri av teimum, nevndin hevur tosað við, kundu hugsað sær at lógirnar ikki komu í gildi fyrr enn um eitt hálvt ár.

Minnilutin setur tí fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

"Landsstýrinum verður álagt at taka uppskotini um tolllógirnar aftur og ikki leggja tey fram á ting aftur fyrr enn allar fyrireikingar eru lidnar/loknar."

Minnilutin ger vart við, at allar EDV-skráir skulu góðkennast frammanundan. Hetta er ikki gjørt enn, og er hetta grovt brot á løgtingslógirnar um almennar og privatar skráir. Skrásetingareftirlitið eigur tí at krevja, at alt arbeiði viðvíkjandi EDV-skráum í sambandi við tolllógirnar steðgar beinanvegin til greiða er fingin á hesum spurningum.

P-talið og A-talið skuldu upprunaliga bert brúkast í tænastuni hjá skattavaldinum. Tað tykist ivasamt, um Føroya Landsstýri og Føroya Tollstova hava heimild at nýta A-talið í skrásetingarblaðnum til vinnurskránna, tó at hetta verður gjørt í fullan mun.

Tað er sostatt eftir minnilutans tykki tørvur á uppaftur strangari reglum fyri nýtslu av persóntali fyri samkoyring av skráum, sum upprunaliga bert skuldu tæna skattavaldinum.

Skulu P-talið og A-talið nú brúkast til øll møgulig onnur endamál, soleiðis sum ætlanin er við tolllógunum. Talan er um eina vinnuskrá, hjálpiskráir, vøruskrá, góðsskrá, postskrá og innflutningsskrá. Minnilutin heldur, at tað er ímóti andanum í løgtingslógini um almennar og privatar skráir, at tølini verða brúkt til onnur endamál enn skatt.

Í 1990 fyrireikaði Føroyskur Fólkafloksungdómur mótmæli móti, at P-talið varð brúkt til onnur endamál enn til skatt. Nú ætlar landsstýrið at nýta A-talið til júst annað enn skatt.

Ein samankoyring av øllum almennum skráum kann fáa óhugnaligar fylgjur fyri einstaklingin.

Minnilutin setur tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

"Landsstýrinum verður álagt ikki at brúka A-talið til onnur endamál enn til skatt, soleiðis sum tað upprunaliga var ætlað."

Løgmaður hevur alment boða frá, at tað hevur ongan týdning, at GATT tollur er uppá triðjalands vørur, tí GATT tollurin skuldi brúkast sum samráðingargrundarlag við triðjalond.

Nevndin er í síni viðgerð annars komin til ta niðurstøðu at suspendera GATT-tollin á ávísum vørum í triðjalondum, og tykist meirilutin í Skattanevndini at hava fingið ljóð fyri hesum frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Men av tí, at løgmaður sigur eitt og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eitt annað, so tykist støðan rættiliga fløkt og tilvildarlig, hóast meirilutin í skattanevndini hevur skotið upp serstaka lógargrein, sum heimilar landsstýrið at suspendera ávísar vørur.

Minnilutin heldur tað vera neyðugt, at vinnan og almenningurin fær at vita, um landsstýrið sambært handilssáttmálanum við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin hevur heimild at suspendera ávísar vørur, og fær at vita, um hetta er í samsvar við andan í avtaluni, og setur tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

"Áðrenn støða verður tikin til tolllógirnar verður álagt landsstýrinum at koma við eini løgfrøðiligari meting av, um tað ber til at suspendera GATT-tollin á ávísum vørur frá triðjalondum."

Minnilutin ger vart við, at hóast avtalan við EF á prenti tykist betur enn tann gamla avtalan, so gera treytirnar, sum fylgja við avtaluni, at eingir fyrimunir eru eftir, sum tala fyri, at tolllógirnar og avtalan við EF fáa gildi fyri Føroyar 1. januar 1992. Fáa tær gildi, so fer hetta at føra til eina vanlukku fyri føroyska samfelagið og serliga føroyska íðnaðin. Hetta fer at hava við sær, at vit innan fá ár verða kroystir uppí sum limir í Europeiska Búskaparliga Felagsskapin, uttan at aðrir møguleikar mótvegis triðjalondum eru troyttir.

Tí heldur minnilutin tað hava týdning, at løgtingssamtyktin um, at vit ikki skulu gerast limir í EF stendur við og verður styrkt við einari nýggjari samtykt.

Tí setur minnilutin fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

"Føroya Løgting samtykkir at halda fast um, at Føroyar ikki skulu gerast limir ella søkja um limaskap í EF."

30. Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

Uppskot

til

Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Lagtingslov om fremstillings- og indførselsafgift.

Kap. 1: Innflutningur

§ 1.

Tað er ikki loyvt at innflyta rúsdrekkaløg, sum í sær hevur 60 vektprosent av alkoholi og at innflyta øl, sum í sær hevur yvir 5,57 rúmprosent av alkoholi.

§ 2.

Fyri vørur, ið verða innfluttar, skal rindast avgjald til landskassan, sum ásett er í frumskjali I (avgjald á innflutningi) til vøruskránna.

Kap. 2: Framleiðsla

§ 3.

Tað er ikki loyvt at framleiða tær í vøruskránni (frumskjal I) 2204-2208 nevndu vørur og at framleiða øl, sum í sær hevur yvir 5,57 rúmprosent av alkoholi.

§ 4.

Fyri vørur, ið við vinnuligum endamáli verða framleiddar til sølu, skal rindast avgjald til landskassan, sum ásett er í

Kap. 1: Indførsel

§ 1.

Indførsel af spiritus, der indeholder over 60 vægtprocent alkohol og af øl, der indeholder over 5,57 rumprocent alkohol er ikke tilladt.

§ 2.

For indførsel af varer skal betales afgift til landskassen som fastsat i bilag I (afgift af indførsel) til varefortegnelsen.

Kap. 2: Fremstilling

§ 3.

Fremstilling af de i varefortegnelsen (bilag 1) 2204-2208 nævnte varer og fremstilling af øl, der indeholder over 5,57 vægtprosent alkohol, er ikke tilladt.

§ 4.

For varer, der fremstilles i erhvervsmæssigt øjemed beregnet til salg, skal der betales afgift til landskassen, som

frumskjali I (avgjald á framleiðslu) til vøruskránna.

§ 5.

Byrjan av vinnuligari framleiðslu av teimum í hesum kapitli nevndu vørum má bert gerast við loyvi frá tollvaldinum.

§ 6.

Fyri vinnuframleiðslu á tolløkinum av øðrum vørum enn tær í frumskjali I (avgjald á framleiðslu) nevndu vørum, kann landsstýrið áseta gjald sum fyri innfluttar vørur.

§ 7.

Tey í hesum kapitli umrøddu gjøld falla til gjaldingar við hvørt mánaðarskifti fyri mánaðin frammanundan.

§ 8.

Tollvaldinum verður heimilað at játta afturrindan av teimum goldnu fram-leiðsluavgjøldunum, tá ið vørurnar verða útfluttar frá tolløkinum.

Kap. 3: Vanligar reglur

§ 9.

Reglurnar í løgtingslóg um toll gilda samsvarandi smb. hesi lóg.

2. stk. Avgjaldsskylduga virðið smb. kap. I er tollskylduga virðið ikki frokna-að toll.

§ 10.

Tollvaldinum verður smb. hesi lóg heimilað at veita avgjaldsfrían innflutning við eftiliti av trygdarbúnaði, ið

fastsat i bilag I (afgift af fremstilling) til varefortegnelsen.

§ 5.

Erhvervsmæssig fremstilling af de i dette kapitel nævnte varer må kun påbegyndes med tilladelse fra toldvæsenet.

§ 6.

Af erhvervsmæssig fremstilling inden for toldområdet af andre end de i bilag I (afgift af indførsel) nævnte varer, kan landsstyret fastsætte afgift som for indførte varer.

§ 7.

De i dette kapitel omfattede afgifter forfalder til betaling ved hvert månedskift for den forudgående måned.

§ 8.

Toldvæsenet bemyndiges til at bevilge refundering af betalte fremstillingsafgifter, når varerne udføres fra toldområdet.

Kap. 3: Almindelige bestemmelser

§ 9.

Bestemmelser i lagtingslov om told finder tilsvarende anvendelse i denne lov.

Stk. 2. Den afgiftspligtige værdi er i henhold til kap. I den toldpligtige værdi eksklusiv told.

§ 10.

Toldvæsenet bemyndiges i henhold til denne lov til at bevilge afgiftsfri indførsel under kontrol af sikkerhedsbeklæd-

kravdur er á vandamiklum arbeiðsplássum.

Kap. 4: Reglur um revsing

§ 11.

Brot móti §§ 1, 3 og 4 kemur undir bót, hefti ella fongsul upp til 1 ár.

Kap. 5: Ígildissetan

§ 12.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1992.

ning, der er påkrævet på farlige arbejdspladser.

Kap. 4: Strafferegler

§ 11.

Overtrædelse af §§ 1, 3 og 4 straffes med bøde, hæfte eller fængsel op til 1 år.

Kap. 4: Ikrafttrædelse

§ 12.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1992.

Viðmerkingar

Sambært handilssáttmálanum við EF kann eingin nýggjur innflutningstollur og einki nýtt avgjald við somu ávirkan sum tollur ásetast í samhandlinum millum felagsskapin og Føroyar.

Munurin á tolli og avgjaldi er, at tollur verður kravdur av so at siga øllum vørum, ið verða innfluttar á tolløkið. Tað sama ger seg galdandi fyri avgjald. Avgjald verður kravt av so at siga øllum vørum, ið verða innfluttar á tolløkið; men haraftrat skal avgjald eisini krevjast av framleiðslu, ið fer fram á tolløkinum.

Møguleikarnir fyri at áleggja toll í framtíðini eru soleiðis skerdir. Tó kunnu Føroyar gera eina skipan við nýtslugjaldi, ið er lagt javnt á innanlands framleiðslu og innfluttar vørur.

Hetta ger tað neyðugt at gera eina nýggja lóg, sum fær heitið løgtingslóg um avgjald á framleiðslur og innflutningi. Henda lóg kemur í staðin fyri løgtingslóg um innflutningsgjald v.m., har ið tær høgt tollaðu vørurnar eru, sum til dømis øl, rúsdrekka, drykkjuvørur, bustavørur, forgrafiskt tilfar, instrument, radiotól, luktilsi, kosmetikk, glasvørur, matvørur, manufakturur, innbúgv o.s.fr.

Teir avgjaldssatsir, ið eru galdandi smb. hesari lóg, verða smb. hesum lógaruppskoti framvegis galdandi í 1992. Tó koma vørurnar, ið ikki hava uppruna í EF, at rinda hægri avgjald, av tí at GATT-tollur verður lagdur til tollvirðið, tað er tað virðið, ið avgjald smb. hesi lóg skal roknast av.

Skuldi landsstýrið gjørt av at hækka avgjald á vørum, ið koma undir nýggju lógina, so skal avgjald eisini hækkast av tilsvarandi vøru, ið verður framleidd í Føroyum.

Landsstýrið metir ikki, at hetta kemur at hava nakran veruligan týdning, tí flestu vørurnar, ið eru í løgtingslóg um innflutningsgjald í dag, og sum við hes-

um uppskoti koma í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi, verða ikki framleiddar í Føroyum í dag; men skuldi tað hent, at vørurnar verða framleiddar í Føroyum í framtíðini, so skal avgjald rindast fyri framleiðslu av sovorðnum vørum, og hetta avgjald skal vera tað sama, sum avgjaldið við innflutning av somu vørum.

Ein broyting, ið tó verður í nýggju lógini, er, at tollvirðið smb. lógini um innflutningsgjald er fob. Av tí at hetta virðið er lagt um, fyri at samsvara við tolllógina annars, er virðið gjørt til cif.

Annars eru reglurnar í løgtingslóg um toll galdandi samsvarandi hesari lóg.

Eisini eru framleiðsluforboðið og innflutningsforboðið av rúsdrekkaløgi tikin við í hetta uppskotið soleiðis, at reglurnar her eru óbroyttar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Til kap. 1: Innflutningur

Til § 1

§ 1 er í høvuðsheitum óbroytt í mun til núgaldandi tolllóggávu, men tekniskt sæð er hon býtt upp í tvey, fyri ein part um innflutning, fyri ein part av framleiðslu. Greinin ásetir forboð fyri at innflyta rúsdrekkaløg, sum í sær hevur yvir 60 vektprosent av alkoholi. Haraftrat er forboð fyri at innflyta øl, sum í sær hevur yvir 5,57 rúmprosent av alkoholi. Her er hend ein broyting í mun til núgaldandi tolllóggávu, sum ásetir forboð í móti at innflyta øl, sum í sær hevur yvir 4,6 vektprosent av alkoholi. Orsøkin til, at vektprosent er broytt til rúmprosent er, at rúmprosent verður vanliga brúkt í dag. 5,57 rúmprosent er tað sama sum 4,6 vektprosent.

Til § 2

Í § 2 eru ásettar reglur um, at avgjald skal rindast til landskassan, sum ásett er í frumskjali 1 til vøruskránna í teiginum avgjøld av innflutningi. Gjøldini eru óbroytt í mun til núgaldandi tolllóggávu.

Til kap. 2: Framleiðsla

Til § 3

§ 3 ásetir, at tað ikki er loyvt at framleiða tær í vøruskránni frumskjali 1, 2204-2208 nevndu vørur.

Hetta eru ikki tær somu vørumar, sum eru nevndar í § 1, men allar vørur, ið innihalda rúsevni, t.v.s. eisini vín og heitvín. Haraftrat er sett forboð fyri at framleiða øl, sum í sær hevur yvir 5,57 rúmprosent av alkoholi. Her er eisini gjørd ein broyting við tað, at vektprosent er gjørt um til rúmprosent.

Viðmerkjast skal, at heimildin fyri brygging av sterkum øli í Føroyum er lóg nr. 115 frá 4/4 - 1928 við seinni broytingum "om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m."

Í hesi lóg er ásett, at loyvi kann gevast til at bryggja øl, ið hevur upp til 4,6 vektprosent av alkoholi.

Neyðugt verður tí at broyta regluna í hesari lóg til 5,57 rúmprosent.

Til § 4

Í § 4 eru ásettar reglur um, at avgjald skal rindast til landskassan fyri vørur, ið við vinnuligum endamáli verða framleiddar til sølu. Avgjaldið er ásett í frumskjali I í teiginum avgjald av framleiðslu, sum liggur sum frumskjal til vøruskránna. Reglan er annars óbroytt í mun til núgaldandi tolllóggávu.

Til § 5

Í § 5 eru ásettar reglur um, at byrjan av vinnuligari framleiðslu av teimum í hesum kapitli nevndu vørum t.v.s. vørur, ið kunnu framleiðast á tolløkinum, bert má gerast við loyvi frá tollvaldinum. Reglan er óbroytt í mun til núgaldandi skipan.

Til § 6

Í § 6 eru ásettar reglur um, at verða aðrar vørur enn tær í frumskjali I í teiginum avgjald av innflutningi nevndu vørum framleiddar, kann landsstýrið áseta sama gjald sum fyri innfluttar vørur. Reglan er eisini óbroytt í mun til núgaldandi skipan.

Til § 7

Í § 7 eru ásettar reglur um, at tey í hesm kapitli umrøddu gjøld falla til gjaldingar við hvørt mánaðarskifti fyri mánaðin frammanundan, og er hetta óbroytt í mun til núgaldandi skipan.

Til § 8

Í § 8 hevur tollvaldið heimild til at játta afturrindan av teimum goldnu framleiðsluavgjøldum, tá ið vørurnar verða útfluttar. Reglan er óbroytt í mun til núgaldandi skipan.

Til kap. 3: Vanligar reglur

Til § 9

Í § 9 er ásett, at reglurnar í løgtingslóg um toll galda samsvarandi í hesi lóg. T.v.s., at reglurnar um revsing, heimild at kæra, tollvirðið o.s.fr., ið eru ásettar í tolllógini, galda samsvarandi í hesari lóg.

Í 2. stk. er ásett, at avgjaldsskylduga virðið smb. kap. 1 er tollskylduga virðið ikki íroknað toll. Tollskylduga virðið vil við nýggju reglunum um uppruna hava við sær, at virðið verður hægri fyri vørur, ið ikki hava EF-uppruna. Sostatt koma flestu av hesum eisini at gjalda hægri avgjald aftan á 1/1 - 92 enn í dag.

Til § 10

§ 10 ásetir reglur um, at tollvaldinum smb. hesi lóg verður heimilað at veita avgjaldsfrían innflutning við eftirliti av trygdarbúnaði, ið kravdur er á vandamiklum arbeiðsplássum. Vanligt er, at endurrindað innflutningsgjøld ikki verða endurrindað.

Uppskot landsstýrisins er, at reglan kemur í hesa lóg soleiðis, at heimild verður at endurrinda hetta gjald. Á tann hátt verður reglan óbroytt í mun til núgaldandi skipan.

Til kap. 4: Reglur um revsing

Til § 11

Í kap. 4 eru ásettar reglur um revsing. Hetta er gjørt, tí at reglan um revsing í tollógini ikki hevur tikið hædd fyri brot á reglurnar í §§ 1, 3 og 4 í hesari lóg. Annars verða reglurnar í løgtingslóg, sum umtalað er í viðmerking til § 9, 1. stk., eisini galdandi í hesi lóg.

Til kap. 5: Ígildissetan

Til § 12

Lógin, ið er ein partur av nýggju tolllóggávuni, kemur í gildi samstundis sum løgtingslóg um toll, t.v.s. 1. januar 1992.

Uppískoyti

til

álit

í

Løgtingsmálunum nr. 29/1991: Løgtingslóg um toll og nr. 30/1991: Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Eyðun Videroy, Jørgen Niclasen og Finnbogi Arge) mæla til at útseta ígildissetingina av nýggju toll- og avgjaldsskipanini við einum mánað og at broyta álitið samsvarandi. Hvat løgtingsmáli nr. 29/1991 viðvíkur setir meirilutin tí fram soljóðani:

broytingaruppskot

1) Broyting nr. 3), § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis:

"Fyri vørur, ið ikki koma undir 2. ella 3. stk., skal rindast tollur sum ásett í toll- og vøruskránni".

2) Broyting nr. 49) verður orðað soleiðis:

"Sett verður inn nýggj § 41:

Henda lóg kemur í gildi 1. februar 1992. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjald, løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald, løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinni broytingum um eykainnflutningsgjald, løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 um lækking av innflutningsgjøldum orsakað av skipan fyri samhandilin millum Føroyar og Felagsmarknaðin og allar serskipanir fyri persónar, feløg og stovnar sambært hesum lógum.

Stk. 2. Tær eldir løgtingslógunum, sum nevndar eru í 1. stk., givnu kunngerðir v.m. verða framvegis í gildi, í tann mun tær ikki ganga ímóti hesi lóg.

Stk. 3. Vørur, ið eru komnar til tolløkið, áðrenn henda lóg kemur í gildi, og sum ikki eru tollavgreiddar áðrenn 1. mars 1992, koma undir hesa lóg".

1) Ændring nr. 3), § 4, stk. 1 affattes således:

"Af varer, som ikke er omfattet af stk. 2 eller 3, skal svares told som fastsat i told- og varefortegnelsen".

2) Broytingar nr. 49) affattes således:

"Som ny § 41 indstættes:

Denne lov træder i kraft 11. februar 1992. Samtidig ophæves lagtingslov nr. nr. 23 fra 11. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgift, lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift, lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 med senere ændringer om ekstra indførselsafgift og lag-tingslov nr. 64 af 23. august 1974 om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet, samt alle særordninger for personer, selskaber og institutioner i henhold til disse love.

Stk. 2. De i henholdt til lagtingslovene, som anført i stk. 1, givne bekendtgørelser m.v. forbliver fremdeles i kraft i den udstrækning, de ikke går imod denne lov.

Stk. 3. Varer, som er ankommet til toldområdet inden denne lov træder i kraft, og som ikke er toldklareret inden 1. marts 1992, er omfattet af denne lov".

Hvat løgtingsmáli nr. 30/1991 viðvíkur setir meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) Broyting nr. 11) verður orðað soleiðis: "§ 12 verður broytt til § 13 og orðað soleiðis: Hendan lóg kemur í gildi 1. februar 1992".	1) *Ændring nr. 11)* affattes således: "§ 12 ændres til § 13 og affattes således: Denne lov træder i kraft 1. februar 1992".

Hvat viðvíkur uppskoti meirilutans til løgtingslóg um innflutningsgjald setir meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) § 6 verður orðað soleiðis: "Hendan lóg kemur í gildi 1. februar 1992".	1) § 6 affattes således: "Denne lov træder i kraft 1. februar 1992".

31. Minstaløn, dagstudningur og minstiforvinningur

Løgtingslóg

um

Minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.

§ 1.

Við tí endamáli at tryggja inntøkur fiskimanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda minstuløn, minstaforvinning og dagstudning til persónar, sum eru heimahoyrandi í Føroyum, og sum vinna á føroyskum fiskiførum, sum hava veiðiloyvi.

§ 2.

Minstaløn/minstiforvinningur er munurin millum forvinning og ásettu minstulønina/minstaforvinningin. Minstaløn-in/minstiforvinninguin verða ikki skerd av manningarstudningum.

§ 3.

Treytin fyri, at fiskimanni er tryggjað minstaløn ella minstiforvinningur, er:

1) At hann er mynstraður eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag. Er eingin tílíkur sáttmáli, er treytin fyri minstuløn, at mynstrað er eftir sáttmála í millum viðkomandi reiðara ella skipaeigara og viðkomandi yrkisfelag.

Lagtingslov

om

Mindsteløn, dagsstøtte og mindsteindtægt.

§ 1.

Med det formål at sikre fiskernes indtægter er landsstyret bemyndiget til at udbetale mindsteløn, mindsteindtægt og dagstøtte til personer, som er hjemmehørende på Færøerne, og som arbejder på færøske fiskefartøjer, som har fiskerilicens.

§ 2.

Mindsteløn/mindsteindtægt er forskellen mellem indtægt og den fastsatte mindsteløn/mindsteindtægt. Mindsteløn/mindsteindtægt reduceres ikke ved mandskabstilskuddene i henhold til denne lov.

§ 3.

Betingelsen for, at en person er sikret mindsteløn eller mindsteindtægt, er:

1) At denne er påmønstret i henhold til overenskomst mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening. Såfremt sådan overenskomst ikke foreligger, er mindstelønnen betinget af, at der er mønstret efter aftale mellem vedkommende reder eller ejer af skibet og vedkommende fagforeninger.

2) Manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini verður latin minstiforvinningur. Treytin fyri minstaforvinningi er, at fiskifarið hevur avreitt, at manningin verður avroknað og í tali er, sum vanligt er á staðnum, og at øll veiða fyri ein túr verður avreidd undir einum.

3) Fyri fiskifør undir 20 brt. eru haraftarat hesar reglur galdandi:

a) At viðkomandi persónur hevur minst 50% av skattainntøku síni seinastu trí ggjar mánaðirnar frá útróðri.

b) At fiskifar, sum roynir við snellu ella snøri, avreiðir minst 25 kilo upp á mannin fyri hvønn veiðidag.

c) At fiskifar, sum royndir við línu, avreiðir minst 50 kilo upp á mannin fyri hvønn veiðudag.

2) Til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri indenfor færøsk fiskerizone udbetales mindestindtægt. Betingelsen for mindsteindtægt er, at fartøjet har landet, at mandskabet bliver afregnet og i antal er som sædvane er på stedet, og at fangsten bliver landet samlet.

3) For fiskefartøjer under 20 brt. er yderligere disse regler gældende:

a) At vedkommende person har erhvervet mindst 50% af sin skattepligtige indtægt de sidste tre måneder fra hjemmefiskeri.

b) At fiskefartøjer, som fisker med snelle, lander mindst 25 kilo pr. mand pr. dag.

c) At fiskefartøjer, som fisker med langline, lander mindst 50 kilo pr. mand pr. dag.

§ 4.

Minstalønin er kr. 12.725,00 um mánaðin ella kr. 424,17 um dagin, hvør veiðiferð roknað sær.

§ 4.

Mindstelønnen er kr. 12.725,00 om måneden eller kr. 424,17 om dagen, hver fisketur beregnet for sig.

§ 5.

Minstiforvinningurin til manningar á útróðrarførum, sum royna við línu, er kr. 958,93 fyri túrin og til manningar á útróðrarførum, sum royna við snøri ella snellu, er minstiforvinningurin kr. 479,46 fyri túrin.

§ 5.

Mindsteindtægten til mandskab på fartøjer, som fisker med langline, er kr. 958,96 for fisketuren og til mandskab på fartøjer, som fisker med snelle, er mindsteindtægten kr. 479,46 for fisketuren.

§ 6.

Til manning, mynstraða á fiskiskipum, verður latin dagstuðningur:

1) Fyri trolarar á feskfiskaveiðu, saltfiskiskip á línuveiðu, frystiskip á hemara- og svartkalvaveiðu v.m., verksmiðjutrolarar á svartkjaftaveiðu,

§ 6.

For mandskab, påmønstret fiskefartøjer, bliver udbetalt dagstøtte:

1) For trawlere på fiskeri efter ferskfisk, saltfiskeskib på linefiskeri, fryseskib på fiskeri efter sildehaj eller hellefisk m.m., fabrikstrawl-

nótaskip, ídnaðartrolarar, verksmiðjutrolarar, sum salta ella frysta veiðuna umborð, frystiskip á rækju- ella skeljaveiðu og skip á laksaveiðu, verður við núverandi minstuløn veitt hvørjum manni eyka fyri hvønn mynstraðan dag á túrinum, tað sum er munurin millum 8 vanligar tímalønir í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 av mánaðarminstulønini. Henda viðbót verður lækkað við 40 oyrum fyri hvørja krónu, sum fiskipartur, froknað minstuløn og manningarstudningur fyri hvønn dagin, fer upp um 1/30 av galdandi mánaðarminstuløn.

2) Fyri manning, mynstraða á fiskiskipum, sum ikki kemur undir reglurnar undir 1) og minstaforvinning, verður henda regla galdandi: Er fiskipartur, prísískoyti, minstaløn og manningarstudningur samanlagt minni enn 8 vanligar tímlønir eftir tí í § 6, pkt. 1 nevnda sáttmála, verður munurin goldin sum serlig viðbót.

§ 7.

Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna umsitur skipanina við minstuløn, dagstudningi og minstaforvinningi. Landsstýrinum er heimilað í kunngerð at seta nærri reglur fyri umsitingina av hesi lóg.

§ 8.

Hendan lóg kemur í gildi 1. december 1991. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 48 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna frá 28. mai 1984 við

ere på fiskeri efter sortmund, ringnoteskib, industritrawlere, fabrikstrawlere, som nedsalter eller fryser fangsten ombord, fryseskib på fiskeri efter rejer eller muslinger og skib på fiskeri efter laks, ydes med nuværende mindsteløn hver mand ekstra kr. 167,19 for hver påmønstret dag på turen. Dette tillæg reduceres med 40 øre for hver krone, som fangstandel, incl. mindsteløn og mandskabsstøtte pr. dag, overstiger gældende mindsteløn pr. dag d.v.s. kr. 424,17.

2) For mandskab påmønstret fiskeskibe, som ikke er omfattet af reglerne under punkt 1) og mindsteindtægt, gælder følgende regel: Hvis fangstandel, mindsteløn og mandskabsstøtte sammenlagt er mindre end kr. 591,36 pr. tur, betales differencen som særligt tillæg.

§ 7.

Fiskernes Lønudligningsfond administrerer ordningen om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt. Landsstyret er bemyndiget i bekendtgørelse at fastsætte nøjere regler for administrationen af denne lov.

§ 8.

Denne lov træder i kraft 1. december 1991. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 48 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet fra 28. maj 1984 med

broytingunum nr. 88 frá 4. oktober 1984, nr. 30 frá 29. mai 1985, nr. 6 frá 17. januar 1986, nr. 42 frá 2. mai 1986, nr. 59 frá 14. mai 1986, nr. 40 frá 20. mai 1988, nr. 32 frá 3. juni 1988 og nr. 105 frá 3. august 1990.

ændringerne nr. 88 fra 4. oktober 1984, nr. 30 fra 29. maj 1985, nr. 6 fra 17. januar 1986, nr. 42 fra 2. maj 1986, nr. 59 fra 14. maj 1986, nr. 40 fra 20. maj 1988, nr. 32 fra 3. juni 1988 og nr. 105 fra 3. august 1990.

Viðmerkingar

Uppskot landsstýrisins um løgtingslóg um minstuløn v.m. hevur verið til ummælis í Fiskivinnustarvsnevndini. Fiskivinnustarvsnevndin hevði broytingaruppskot til fleiri av greinunum. Landsstýrið hevur tikið tilmæli frá Fiskivinnustarvsnevndini til eftirtektar. Í ávísum førum hevur landsstýrið sett orðingarnar hjá Fiskivinnustarvsnevndini inn í lógaruppskotið. Í øðrum førum, har broytingaruppskotini vóru ímóti tí, sum semja er um í samgonguni, ella t.d. teirri broyting av skipanini við minstaforvinningi, sum Fiskivinnustarvsnevndin skeyt upp, men sum Meginfelag Útróðrarmanna mótmælti, eru broytingaruppskotini ikki tikin við.

Aðalbroytingarnar eru:

1) Treytin fyri, at útgoldin verður minstaløn, dagstudningur ella minstiforvinningur er, at viðkomandi persónur er heimahoyrandi í Føroyum og vinnur á føroyskum fiskifari, sum hevur veiðiloyvi.

Grundin til hesa orðing er í fyrsta lagi, at bert persónar, ið vinna á føroyskum fiskiførum, sum hava veiðiloyvi til at royna á føroyskum sjóøki ella av kvotum sambært fiskivinnuavtalur millum føroysku myndugleikarnar og myndugleikarnar í øðrum londum, hava rætt til minstuløn v.m.

Í øðrum lagi umfatar hendan orðing eisini føroysk fiskifør, sum ikki hava veiðiloyvi til at fiska á føroyskum sjóøki ella av kvotum smb. almennar fiskivinnuavtalur við onnur lond. Skipanin umfatar solciðis t.d. eisini føroysk skip, sum hava fingið upphøggingarstuðul, men sum hava veiðiloyvi. Hesi veiðiloyvi verða latin, um hesi eru í samsvar við føroyskar reglur, í samsvar við reglurnar í tí landi, á hvørs sjóøki fiskiskapurin er ætlaður ella í samsvar við altjóða avtalur og samtyktir, sum Føroyar eru bundnar av.

Ein av trupulleikunum í galdandi lóg um minstaforvinning fyri før undir 20 brt. er, at minst 50 prosent av inntøkuni árið frammanundan skulu stava frá fiskivinnu, um persónur skal hava rætt til minstaforvinning. Henda skipan virkar í mongum førum bæði tung og órættvís, m.a. tí at persónurin kann verða noyddur at rógva út í eitt heilt ár, áðrenn hann kemur inn í skipanina. Fyri at bøta um

henda skeivleika gevur lógin heimild til at geva undantaksloyvi fyri útgjalding av minstaforvinningi.

Í nýggja lógaruppskotinum er hetta broytt soleiðis, at minst 50 prosent av inntøkuni seinastu tríggjar mánaðirnar skulu stava frá útróðri, fyri at persónur við fiskifari undir 20 brt. kann koma undir minstaforvinning. Hinvegin er eingin møguleiki fyri undantaksloyvi, sum eisini skuldi verið óneyðugt, tí tað í mesta lagi ganga tríggir mánaðir at koma inn undir skipanina.

Orðingin um, at minst 50 prosent av inntøkuni seinastu tríggjar mánaðirnar skulu stava frá útróðri, fyri at persónur við fiskifari undir 20 brt. kann koma undir minstaforvinning, er eisini nýggj. Orðingin er gjørd fyri at tryggja, at bert teir, ið hava útróður sum høvuðsvinnuveg, koma undir skipanina við minstaforvinningi. Tað áliggur sjálvsagt viðkomandi yvirfyri Lønjavningargrunninum at prógva, at so er.

Útróðrarmaður sambært hesi lóg er persónur, sum vinnur á føroyskum fiskifari undir 110 brt., sum hevur veiðiloyvi.

Fyri at tryggja sær, at tað bert eru teir, sum veruliga reka útróður sum høvuðsvinnuveg, er sett treyt fyri før undir 20 brt. soleiðis, at snellu/- snørisbátar skulu avreiða minst 25 kg upp á mannin og bátar á línuveiði skulu avreiða minst 50 kg upp á mannin, um túrurin skal koma undir minstaforvinning.

32. Broyting í løgtingslóg um prísískoyti til ráfisk

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um prísískoyti til ráfisk.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til rálisk verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Prísískoyti verður eisini latið fyri fisk, sum verður seldur á uppboðssølu, treytað av at ásettar treytir viðvíkjandi minstaprísi og veiðinøgd, sum skal seljast um telefonuppboðssøluna, verða uppfyltar. Landsstýrið, saman við fiskivinnunevnd løgtingsins, lýsir í kunngerð nærri reglur um prís og nøgdir."

2) § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Prísískoyti verður býtt eftir sáttmála ella avtalu, ið øll vinnufeløgini gera áðrenn 1. januar 1992."

3) § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Fyri ráfisk, sum verður útfluttur óvirkaður, sambært § 2 a, í hesi lóg, verður prísískoyti ikki endurrindað. Ráfiskakeypari ger í uppgerð síni til Lønjavningargrunnin, sambært § 3, stk. 1, vart við, hvussu nógv av keypta ráfiskinum ikki er virkaður."

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om pristilskud til råfisk.

§ 1.

I lagtingslov nr. 111 af 3. august 1990 om pristilskud til råfisk foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 2 affattes således:
"Der ydes også pristilskud for fisk, som sælges på auktion, dog betinget af, at fastsatte betingelser for pris og mængde, der skal sælges på telefonauktionen, overholdes. Landsstyret, sammen med lagtingets fiskeriudvalg, fastsætter i bekendtgørelse nærmere betingelser".

2) § 1, stk. 3 affattes således:
"Pristilskud fordeles efter overenskomst eller aftale, som alle organisationerne indgår før 1. januar 1992."

3) § 3, stk. 3 affattes således:
"For råfisk, der eksporteres uforarbejdet, jfr. § 2 a, i denne lov, refunderes pristilskud ikke. Råfiskekøber gør i sin opgørelse, jfr. § 3, stk. 1, opmærksom på, hvor stor en del af den indkøbte råfisk, der ikke er forarbejdet."

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. januar 1992.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1992.

Viðmerkingar

Við hesum broytingum fáast heimildir at seta øktar treytir fyri útgjalding av prísískoyti. Hesar treytir eru:

1) At minstaprísur er á telefonuppboðssøluni og at ávísar nøgdir fara í gjøgnum uppboðssøluna.
2) At prísískoyti verður býtt eftir sáttmála ella avtalu millum partarnar.
3) Einki prísískoyti verður útgoldið fyri fisk, sum ikki verður virkaður.

Minstaprísur á telefonuppboðssøluni

Ætlanin er at seta nærri reglur, har minstaprísurin er ávísur prosentpartur av miðalprísinum mánaðin fyri. Henda trygd skuldi gjørt, at eingin fordan er fyri at fara á uppboðssøluna.

Ávísar nøgdir gjøgnum uppboðssøluna

Ætlanin er at útvega sær heimild til at krevja, at upp til ein triðingur av øllum ráfiski fer gjøgnum telefonuppboðssøluna. Hetta kann t.d. gerast við at krevja, at 3. hvør túrur (sum í minsta lagi skal vera 6 dagar) fer ígjøgnum telefonuppboðssøluna, ella aðrar reglur, sum tryggja, at hvørt fiskifar selur um triðingin á uppboðssølu. Um minni enn triðingurin fer um uppboðssøluna, missir fiskifarið prísískoytið til tað, sum restar í.

Fiskur, sum ikki verður virkaður

Sum lógin er orðað, verður prísískoyti goldið fyri allan keyptan ráfisk. Einaferð um fjórðingsárið skal Lønjavningargrunnurin so mótrokna fyri møguligan óvirkaðan fisk. Henda skipan hevur ikki virkað væl. Við hesi broyting verður tað skylda hjá ráfiskakeyparanum - beinanvegin - at geva upp, hvussu nógv er farið óvirkað, tá hann sendir uppgerð inn hvørja viku.

Býti av prísískoytinum

Prísískoytið verður at býta millum skip og manning eftir avtalu partanna millum. Avtalan ella sáttmálin skal vera galdandi og bindandi. Um ikki slík avtala er eftir 1. januar 1992, verður einki prísískoyti útgoldið.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 32/1991: Broyting í løgtingslóg um prísískoyti til ráfisk.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. november 1991 og eftir 1. viðgerð 29. november 1991 beint í Fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Olaf Olsen, Jørgen Niclasen, Jógvan Ingvard Olsen og Leivur í Buð) vísir á, at í pkt. 3 í uppskotinum frá landsstýrinum er komin ein prentvilla. Har tað stendur § 3, stk. 3, eigur at standa § 3, stk. 2 og setir meirilutin tí fram broytingaruppskot um hetta.

Fiskivinnunevndin hevur fingið skriv frá landsstýrinum dagfest tann 29. november 1991. Landsstýrið sigur í skrivinum: "Nú uppskot um broyting av løgtinglóg nr. 111, um prísískoyti til ráfisk, frá 3. august 1990 við broyting í løgtingslóg nr. 31, um broyting av løgtingslóg nr. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til ráfisk, frá 7. mai 1991, liggur í tinginum, er komið fram í samband við ætlanina um tvungna uppboðssølu, at ikki er møguligt at seta revsitiltøk í verk móti teimum, sum ikki selja ásettu nøgdina um uppboðssøluna. Mælt verður tí til at eitt stk. 2 verður skoytt uppí § 6, broytt til § 7, í lógartekstinum frá 7. mai 1991. Meirilutin tekur undir við hesum tilmæli landsstýrisins.

Meirilutin tekur undir við uppskoti landsstýrisins við nevndu broytingum og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1., pkt. 3, verður "stk. 3" broytt til "stk. 2".	I " 1., pkt. 3, ændres "stk. 3" til "stk. 2". Som nyt pkt. 4 sættes:
Sum nýtt pkt. 4 verður sett:	Som ny § 7. stk. 2, sættes:
Sum nýggj § 7. stk. 2. verður sett:	
"Í forskriftum, sum eru gjørdar við heimild í hesi lóg, kunnu gerast reglur um revsing við bót fyri brot á hesar forskriftir".	"I forskrifter, som udstedes i medfør af denne lov, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af disse forskrifter".

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur støðu í tingsalinum.

33. Søla av "m/t Nónhamri" til manning, reiðarí og/ella aðrar

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum ikki í longri tíð at standa sum eigaru av fiskiskipi og at m/t "Nónhamar", sum landsstýrið hevur átt síðani 1979 við tilhoyrandi kvotum og fiskiloyvi og møguleika at býta um við annað skip, verður seldur manning, reiðarí og/ella øðrum.

Viðmerkingar

Landsstýrið keypti á tvingsilssølu í 1979 m/t "Nónhamar", sum partafelag við sama navni í Klaksvík hevði latið byggja í 1976.

P/F J. F. Kjølbro í Klaksvík hevur síðan rikið trolaran fyri landið og reitt hann út. Manningin hevur tey nógvu árini verið hin sama.

Tað hevur ljóðað, at manningin saman við reiðarínum hevur havt hug at keypa trolaran, men tað hevur ongantíð eydnast at fingið politiskan meiriluta fyri hesum.

Øll áttatiárini hevur hetta órógvað tey politisku viðurskiftini í Føroyum, og nú eru týðilig tekin til, at tað sama verður lagið í nítiárunum.

Ein av teimum 17 samgongutingmonnunum sigur seg í løtuni umhugsa stuðul sín til landsstýrissamgonguna og gevur sum grund, at landsstýrið hevur samtykt at geva øðrum skipi kvotuna hjá m/t "Nónhamri".

Fyri at sleppa undan poltiskum ófriði um, hvør skal hava kvotuna hjá einum fiskiskipi, sum landið stendur sum eigari av, verður skotið upp, at tann manning og tað reiðarí, sum øll árini hava rikið nevnda trolara, fáa loyvi til at keypa hann við kvotu og fiskiloyvi og eisini fáa loyvi til at býta trolaran um við ein nýggjari, um hugur er til tess, tí at m/t "Nónhamar" er bygdur fyri 15 árum síðani.

Um so er, at manningin og reiðarfíð ikki vilja keypa trolaran, eigur hann at verða boðin teimum gomlu eigarunum ella øðrum at keypa, tí at tað er púra burturvið, at landið eigur ella rekur fiskiskip. Alla aðrastaðni sleppa teir sær í dag burtur frá sovorðnum vinnulívsskipanum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 33/1991: Søla av m/tr. "Nónhamri" til manning, reiðarí og/ella aðrar.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 7. november 1991 og eftir 1. viðgerð 21. november 1991 beint í tinggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

34. Toll- og avgjaldsfrælsi fyri lágorku-, sokallaðar "spariperur"

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at skipa so fyri, at lágorkuperur, tær sokallaðu "apriperurnar", fáa tað sama toll- og avgjaldsfrælsi í Føroyum, sum tær hava í grannlondum okkara.

Viðmerkingar

Sambært upplýsingum frá Tollstovu Føroya er tollur og avgjøld 63% á øllum ravmagnsinnleggingarlutum, og harvið eisini á lágorkuperum, teimum sokallaðu "spariperunum".

Fyri nøkrum árum síðani varð tollurin á kviksilvurperum avtikin, tí at hesar spardu orku.

Tær nýggju lágorkuperurnar føra eina munandi størri sparing við sær enn allar aðrar perur. Tær brúka millum fimm og seks ferðir minni orku samanborið við, hvat ið ein vanlig gløðipera brúkar. Ein 11 watt lágorkupera svarar til eina 60 watt gløðiperu, sum eru tær mest vanligu í Føroyum.

Í Danmark sleppa lágorkuperurnar undan øllum tolli og avgjøldum. Ein sovorðin pera kostar har tí 120 kr., meðan prísurin í Føroyum í dag er 280 kr. fyri sama slag. Marknaðarkanning í Danmark vísir, at prísurin skal niður ímóti 100 kr. fyri hvøjra peru, áðrenn fólk fara at keypa og brúka tær.

Lágorkuperurnar eru so orkusparandi, at eitt ravmagnsverk í Danmark herfyri gjørdi av at býta út 100.000 sovorðnar perur. Hvørt húsarhald fekk ókeypis 2 "spariperur". Mett varð, at samlaða orkunýtslan fer so nógv niður, at tað slapst undan kostnaðarmiklum nýfløgum, um fólk fóru undir og lærdu at brúka hesar perurnar.

Her heima á landi royndi SEV í 1989 við lýsingum at fáa fólk at minka um orkunýtsluna. Orkunýtslan er eisini farin munandi niður.

Eftir ein støðugan vøkstur upp á 5% um árið tey seinastu 20 árini, er streymnýtslan í Føroyum tey seinastu tvey árini minkað við 2 og 4%.

Hetta kemst ivaleyst meira av minkandi vinnulívsvirksemi enn av tí, at minni streymorka verður nýtt í húsarhaldinum.

Verða tollurin og avgjøldini tikin av fyri lágorkuperurnar, so at hesar verða bíligari at keypa hjá fólki og meiri brúktar, førir tað eina munandi sparing við sær í orkunýtslu bæði fyri hvørt húsarhald og fyri framleiðaran.

Endamálið má vera at lætta um bæði hjá tí privata og tí almenna, so at tað so nógv sum møguligt slepst undan stórum nýfløgum á ravmagnsøkinum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 34/1991: Toll- og avgjaldsfrælsi fyri lágorku-, sokallaðar "sparipærur".

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 7. november 1991 og eftir 1. viðgerð 21. november 1991 beint í Skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og spurt seg fyri hjá Tollstovuni og hjá Prísráðnum. Tollstovan hevur upplýst, at tekniskt er talan um "ljósstoffrør" ið er tariffera að annaðleiðis enn gløðiperur. Upplýst varð at lágorkuperurnar eru uttan toll í Danmark. Prísráðið kann ikki í løtuni siga nakað um tann stóra prísmunin millum donsku og føroysku ásetingina, sum er so stór, at hetta eigur at verða kannað nærri.

Nevndin mælir frá at samtykkja uppskotið og setir í staðin fram soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera neyðugar kanningar um lágorkuperurnar og um úrslitið tatar fyri tí, at leggja fram uppskot til broytingar í galdandi tolllóg.

35. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vardar íbúðir

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í lóg um vardar íbúðir.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 111 frá 3. oktober 1988 um vardar íbúðir verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 verður skoytt uppí sum nýtt pkt. 4:
4) "rakstrarstudning til aðrar útreiðslur".

2) § 5 gongur út og sum nýggj § 5 verður sett:
"Í rakstrarstudningi kann veitast upp til 50% av útreiðslunum til rentur og avdráttir av upprunaligu prioritetslánunum og av øðrum útreiðslum."

Lagtingslov om ændring i lov om beskyttede boliger.

§ 1.

I lagtingslov nr. 111 af 3. oktober 1988 om beskyttede boliger foretages følgende ændringer:

1) I § 2 tilføjes som nyt pkt. 4:
4) "driftstilskud til andre udgifter."

2) § 5 udgår og i stedet indsættes som ny § 5:
"I driftstilskud kan ydes op til 50% af udgifterne til renter og afdrag af de oprindelige prioritetslån og af andre udgifter."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen

Viðmerkingar

Løgtingslógin um vardar íbúðir kom í gildi fyri trimum árum síðani, og higartil kann sigast, at áhugin fyri at nýta hesa lóg hevur verið heldur avmarkaður. Tað er bara í Havn, at vard íbúð er komin, meðan ein er keypt í Vági, men tó ikki tikin í nýtslu.

Vísandi til førleikan hjá umsøkjarum, sum hava áhuga fyri hesum íbúðum, verður bildið, at neyðugt er, at ávís umsjón og ábyrgd finnst í næsta umhvørvi, sum íbúgvararnir kunnu venda sær til á nátt og uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Ein meginorsøkin til vantandi áhuga fyri vardum íbúðum frá møguligum íbúgvum er, at ein ávísur ótryggleiki er við ongari umsjón, og síggja kommunurnar sær tá ikki førleika fyri at reka hesar íbúðir fíggjarliga.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 35/1991: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vardar íbúðir.

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 7. november 1991 og eftir 1. viðgerð 26. november 1991 beint í Almanna- og Heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við avvarðandi landsstýrismann Jóannes Eidesgaard.

Á fundinum varð upplýst, at í landsstýrinum fyriliggur eitt álit um døgnvaktarskipan.

Aðalmálið er, at fólk búgva heima so leingi, tað letur seg gera.

Fyri at veita avvarðandi fólkum tryggleika og fyri at halda eitt rímiligt kostnaðarstøði, heldur nevndin, at besta loysnin var, um útvegaðar vórðu hóskandi skipanir, ið nøkta tørvinum meira generelt og til ein minni kostnað, tá fleiri kunnu gera nýtslu av hesum.

Í staðin fyri fyriliggjandi uppskot setir nevndin tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til nøktandi skipan til at veita fólki tryggleika, ið hava tørv fyri hesum í slíkum spurningum.

36. Keyp av bygningi til HF í Suðuroy

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at taka upp samráðingar við eigaran av Digo í Vági um keyp av ognini til undirvísingarendamál.

Viðmerkingar

Vísandi til fløguætlan landsstýrisins skilst á lagnum, at ongar fløgur verða gjørdar í skúlabygging í Suðuroy hetta valskeiðið.

Hølisumstøðurnar hjá HF í Vági eru í dag so út av lagi vánaligar, fyri ikki at siga ólógligar, at bráðneyðugt er at útvega meiri tíðarhóskandi høli til hesa undirvísing.

Eisini verður bildið, at skipanin undir verandi umstøðum er ov kostnaðarmikil, og verður tí mælt til eina ódýrari og fyri næmingarnar munandi betri loysn við keypi av handilsbygninginum DIGO, sum er lýstur til sølu.

Ein vanlig skúlastova er um 48 fermetrar, og HF hevur brúk fyri 5 skúlastovum og 2 serhølum. Rúmsátt skuldi soleiðis verið í hesum bygningi, sum hevur 3 hæddir á 192 fermetrar.

Bygningurin liggur væl fyri miðskeiðis í býnum og er í góðum standi. Góðar umstøður eru bæði uttan og innan, og er verandi innrætting víst í hjáløgdum skjali.

Líkningarráðið, sum heldur til í bygninginum, rindar árliga 85.000 kr. í leigu. Leiguútreiðslurnar fyri HF eru 360.000 kr. árliga, og harafturat kemur koyring fyri 420.000 kr. fyri lærarar og næmingar.

Í fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins fyri 1992 verður Miðnámsútbúgvingin í Suðuroy mett at kosta 5,9 mió. kr., meðan sama landsstýrið skjýtur upp at játta 5,2 mió. kr. til hetta endamál.

Vísandi til tann lítla samanhangin millum tørv, játtan og úmhugsaðar avgerðir á skúlaøkinum, og vísandi til, at landsstýrið hevur slept stýringini av miðnámsútbúgvingarskipanini, verður tað hildið skilagott, at løgtingið útvegar HF í Suðuroy hóskandi frálæruumstøður, samstundis sum árligu rakstrarútreiðslurnar verða skerdar við einum 10%. Upplýst er, at bygningurin kann fáast fyri einar 3 mió. kr.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 36/1991: Keyp av bygningi til HF í Suðuroy.

Málið er lagt fram av Hergeir Nielsen, løgtingsmanni, tann 7. november 1991 og undir 1. viðger 26. november 1991 beint í Mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjarni Djurholm, Jógvan A. Johannessen og Terje Davidsen) tekur ikki undir við málinum, men mælir til at beina málið til landsstýrið til viðgerð í tilknýti til ætlaðu heildarloysn av hølisspurninginum hjá skúlunum í Suðuroy.

Ein minniluti (Mikkjal Sørensen og Signar Hansen) harmast um, at eingin verulig viðgerð er farin fram av uppskotinum um at keypa handilsbygningin DIGO í Vági til undirvísingarendamál.

Tá soleiðis er, og tá havt verður í huga, at bert lítil upphædd er sett av í fløgutætlanini hjá samgonguni, verður hildið, at hetta er eitt uppskot, sum skuldi átt góðar møguleikar fyri at verið samtykt.

Minnilutin hevur í løgtingsins skúlanevnd mælt til, at nevndarlimirnir fara suður til Vágs at hyggja eftir hesum húsum og frálæruumstøðunum har, men nevndin hevur ikki víst áluga fyri tí.

Upplýst verður í málinum, at um so er, at løgtingið keypir DIGO til undirvísingarendamál, so falla árligu rakstrarútreiðslurnar við 10%.

Bygningurin kann fáast til keyps fyri 3 mió. kr., t. e. umleið 4.000 kr. fyri fermeturin, og hetta má sigast at vera ein sera bílig loysn, og serliga tá hugsað verður um, at kanska út í móti helvtini kemur innaftur í landskassan sum skattur.

Minnilutin heldur, at tað skulu góðar grundgevingar til, fyri at vera ímóti at útvega næmingunum í Suðuroy brúkilig hølisviðurskifti fyri ein bíligari kostnað enn verandi.

Minnilutin (Signar Hansen og Mikkjal Sørensen) mælir løgtinginum til at taka undir við uppskotinum hjá Hergeir Nielsen.

37. Broyting í løgtingslóg um lán til tunnil um Vestmannasund

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lán til tunnil um Vestmannasund.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 63 frá 9. juni 1988 um lán til tunnil um Vestmannasund, verður gjørd henda broyting:

§ 2 fellur burtur og í staðin verður sett sum nýggj § 2:

"Farið verður ikki undir at gera tunnil um Vestmannasund komandi fýra árini frá tí, at henda lóg er kunngjørd."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om lån til tunnel om Vestmannasund.

§ 1.

I lagtingslov nr. 63 af 9. juni 1988 om lån til tunnel under Vestmannasund foretages følgende ændring:

§ 2 bortfalder og som ny § 2 indsættes:

"Tunnelen under Vestmannasund påbegyndes ikke før fire år efter, at denne lov er bekendtgjort."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Tá ið fíggjarlógin fyri 1992 var til viðgerðar, varð spurningurin havdur á lofti, hvørt landsstýrið ætlar at seta gongd á aftur gerð av tunnli um Vestmannasund.

Svarið, sum tá kom, var heldur ógreitt. Nú er kortini lítil ivi um, at farið verður til verka.

Heimildirnar at fara undir hesa ferðing eru í lagi. Tað fyriliggur bæði løgtingssamtykt um tunnilin, og løgtingslóg um lántøku upp á 200 miljónir krónur til endamálið. Men ein grundleggjandi fortreyt er fokin, nevniliga fíggjarorka landsins.

Ikki at viðurkenna hetta, meðan stundir eru til tess, er bæði ónoraldskt og ábyrgdarleyst. Vit hava ikki ráð at seta hetta arbeiðið í gongd nú, vit hava ikki ráð til at økja um lánibyrðu landsins og hjá komandi ættarliðum við fleiri hundraðtals miljónum krónum til hetta endamálið.

Tað tykist sum hava somgongupolitikkarar tryggjað sær, at málið kemur ikki aftur á tingborð. Tí ber tað til hjá teimum, hvør í sínum lagi, at vera annaðhvørt fyri ella ímóti. Tað fær ongar avleiðingar kortini.

Tá metast skal um so stóra íløgu, má fremsti spurningurin vera, um tað er ein íløga, ið økir um útflutningsvirði okkara. Er tað ein íløga, ið bøtir munandi um umstøðurnar hjá vinnuni? ella er tað ein íløga í øktum forbrúki, ein íløga í øktari nýtslu?

Hóast vit eiga at unna vágafólki so góðar samskiftisumstøður sum møguligt, so er talan um økt forbrúk.

Bert í rentum og avdráttum av teimum lánum, ið verða neyðug at taka til endamálið, mugu vit gjalda nógvar milliónir um árið tey næstu nógvu árini umframt tola avleiðingarnar av uppaftur øktari uttanlandsskuld.

Er nakar álvari í hesum máli, eiga vit at fara undir at seta pening til viks til endamálið yvir eitt áramál. Tá ber til at seta í verk løgtingssamtyktina um tunnil um Vestmannasund.

Útbyggingin, ið farin er fram í samfelagnum, hevur sprongt allar fíggjarkarmar. Vit hava í góðum tíðum ført ein sera ekspansivan fíggjarpolitikk og ikki lagt upp fyri verri tíðum. Nú, ið verri tíðir eru, er bert eitt at gera, og tað er at steðga tí ekspansiva politikkinum beinanvegin.

Tað er ikki bert undirsjóvartunnilin, ið eftir umstøðunum átti at verið útsettur. Íløguætlanin, ið landsstýrið legði fyri løgtingið saman við fíggjarlógini fyri 1992, má endurskoðast øll sum hon er, og Føroya Løgting átti at tikið til viðgerðar allar tær løgtingssamtyktir, ið gjørdar vóru, tá ið fortreytirnar at byggja út vóru heilt øðrvísi.

Sjúkrahúsútbygging, vega-, havna- og tunnlaútbyggingar mugu laga seg eftir umstøðunum, ið eru í landinum nú. Øll tøk orka eigur at verða nýtt til tess at skapa økt virði her á landi.

Tað er tí týdningarmikið, at tingmannagin fær høvi til at gera av, um tað er rætt at fara undir ein undirsjóvartunnil um Vestmannasund nú, ella um henda ætlan eigur at verða steðgað og útsett.

Tí verður omanfyristandandi lógaruppskot sett fram.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 37/1991: Broyting í løgtingslóg um lán til tunnil um Vestmannasund.

Málið er lagt fram av Helenu Dam á Neystabø, løgtingskvinnu, tann 7. november 1991 og eftir 1. viðgerð 28. november 1991 beint í Samferðslunevndina.

Endamálið við uppskotinum er at gera broyting til løgtingslóg nr. 63 frá 9. juni 1988, soleiðis at ætlaða gerðin av tunnli undir Vestmannasundi verður, ið hvussu so er, útsett í 4 ár frá tí, at fyriliggjandi lóganuppskot er samtykt.

Í viðmerkingunum verður víst á vánaligu fíggjarstøðu landsins, at hóast lógarheimild bæði til at gjøgnumføra arbeiðið og til lántøku, so er høvuðsfortreytin, tann fíggjarliga, fokin. Ikki verður hildið ráðiligt at økja um lánbyrðu landsins til eina tílíka íløgu, ið ikki fremur støtri útflutningsvirði ella bøtir um umstøðurnar hjá vinnuni, men at her er bert talan um økt forbrúk.

Uppskotsstillarin vísir á, at ikki bert ætlaða gerð av undirsjóvartunnli eigur at verða steðgað, men eisini aðrar ætlaðar íløgur, sambært íløguætlanina hjá landsstýrinum, eiga at verða endurskoðaðar, so sum sjúkrahúsútbygging, vega-, havna- og tunnilsútbyggingar.

Tá málið var til viðgerðar, nevndi uppskotsstillarin, at hon ynskti, at málið ikki kom til aðru viðgerð í løgtinginum, fyrr enn fíggjarløgtingslógin var samtykt.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd við uppskotsstillaran um, at varsemi eigur at verða víst í sambandi við støtri íløgur, nú fíggjarstøðan og útlitini framyvir eru so vánalig. Men nevndin heldur kortini, at neyðugt er við nakað av íløguvirksemi, bæði hvat viðvíkur neyðugari útbygging av samfelagnum og til at skapa eitt ávíst virksemi, og tí kann ikki verða rætt at taka eitt einstakt mál burtur úr heildini og lóggeva fyri at útseta fremjingina, meðan onnur arbeiði kunnu fara í gongd, tá løgtingið samtykkir tað.

Í hesum sambandi verður víst á løgtingsmál nr. 39/1991: Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum - og viðmerkingar frá fíggjarnevndini til sama mál, har staðfest verður, at so hvørt ætlanin er at fara undir nýggjar íløgur, so skal heimild til fígging beinleiðis framganga av fíggjarløgtingslóg, eykafíggjarlóg ella við eykajáttan.

Eisini verður víst á viðmerkingarnar frá Fíggjarnevndini til fíggjarløgtingslógina 1992.

Vísandi til omanfyrinevndu viðmerkingar tekur nevndin ikki undir við uppskotinum, men setir samd Samferðslunevnd fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið yvirlit yvir raðfesting av ætlaðum íløgum á samferðsluøkinum.

38. Eykafíggjarlóg

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. november 1991 og eftir 1. viðgerð 5. desember 1991 beint í Fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og ásannar, at betri var, um eykafíggjarlógin var liðugt viðgjørd og samtykt, áðrenn árið var lokið og áðrenn fíggjarlógin fyri næsta árið verður samtykt.

Tað má haldast at verða bæði gagnligt og eisini rætt, at eykafíggjarlóg verður gjørd seinast í árinum, tí tá er lættari at ætla um, hvussu støðan er, um stovnarnir hava hildið fíggjarættanirnar ella ikki. Tað verður neyvan nakrantíð so neyvt ætlað, at ikki onkur eykjáttan má verða givin av landsstýri og fíggjarnevnd í fíggjarárinum, so sum vanligt hevur verið.

Fíggjarnevndin heldur, at ein síðsta freist til framløgu av uppskoti til eykafíggjarlóg eigur at verða sett so mikið tíðliga, at Fíggjarnevndin fær stundir til at viðgera eykafíggjarlógina soleiðis, at hon kann verða samtykt í góðari tíð, sum áður nevnt. Nevndin er samd um, at 10. november verður settur sum seinasti eykafíggjarlógarframløgudagur. Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður sagt "tær meirnýtslur, sum verið hava, eru fyri tað mesta lógarfestar. Nakrar eykajáttanir eru givnar av Fíggjarnevndini í árinum og eru hesar merktar við x) í lógaruppskotinum".

Undir viðgerðini í Fíggjarnevndini kom fram, at ikki allar tær eykajáttanir, ið Fíggjarnevndin hevur givið, eru við í eykafíggjarlógini. Antin eru játtanirnar ikki nýttar, ella hevur umsitingin av eini ella aðrari orsøk ikki fingið játtanirnar við í eykafíggjarlógina.

Fíggjarnevndin heldur, at greiðar upplýsingar áttu at verið um hesi viðurskifti í viðmerkingunum til uppskotið til eykafíggjarlógina.

Í viðmerkingunum til eykafíggjarlógina, sigur landsstýrið at "tað, at eykajáttanir eru í hesum lógaruppskoti, er ikki tað sama sum, at slíkar kunnu útvegast aftur komandi ár. Har meirnýtsla er, verður henda gjølla kannað av viðkomandi deild innan landsfyrisitingina og viðkomandi stovnur má greiða umsitingina betur í framtíðini".

Her er Fíggjarnevndin samd í, at stovnur, ið av eini hvørji orsøk ikki sær seg føran fyri at halda játtanina, skal í góðari tíð boða frá hesum til landsstýrið.

Nevndin heldur tað ikki verða nøktandi, at játtaðar verða slakar 12 miltiónir krónur til trygdargrunn alivinnunnar uttan nærri upplýsingar ella fylgiskjøl. Mælt verður tí til, at hesin peningur verður endaliga játtaður eftir umsókn av landsstýrinum samanan við Fíggjarnevndini.

§ 19.904:

333.408	Trygdargrunnur alivinnunar	kr. 11.600.000,-
	áður játtað	kr. 4.800.000,-
		kr. 6.800.000,-

verða endaliga játtaðar av landsstýrinum saman við Fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin hevur í 1991 eftir umsókn frá landsstýrinum veitt hesar eykajáttanir:

12. mars	Heilsu og heimasjúkrasystrar	kr.	2.031.000,-
11. apríl	Andveikraverndin	kr.	600.000,-
11. apríl	Studn. til ferðir innanoyggja	kr.	103.162,-
6. mai	Ljósritagrunnurin	kr.	70.000,-
7. juni	Semingsstovnurin	kr.	80.000,-
12. juni	Fróðskaparsetur Føroya	kr.	1.000.000,-
25. juni	Nýggj avgjaldsskipan	kr.	4.500.000,-
11. juli	Útbygging Klaksvíkar Sjúkrahús	kr.	755.000,-
16. juli	HF-skeið, Suðuroy	kr.	500.000,-
	P/F Fjarðará	kr.	4.800.000,-
10. sept.	Hagstova Føroya	kr.	1.000.000,-
10. sept.	Trygdargr. avreiðing og lønir	kr.	108.404,-
1. okt.	Oljuútbúgvingar	kr.	250.000,-
1. okt.	Føroya lærurað	kr.	200.000,-
13. nov.	Tórshavnar býráð, Ellisheimið	kr.	150.000,-
		kr.	16.147.566,-

7. juni	**Strandferðslan:**		
	fyri 1989	kr.	7.931.593,78
	fyri 1990	kr.	17.399.225,-
		kr.	25.330.818,78

Fíggjarnevndin er samd um at heita á landsstýrið um til eina komandi eykafíggjarlóg at fáa við í viðmerkingarnar til lógaruppskoti eina uppstilling yvir:

1. Meirútreiðslur í samband við lógarbundnar útreiðslur.
2. Yvirlit yvir givnar játtanir frá landsstýrinum og fíggjarnevnd løgtingsins.
3. Munin millum punkt . 1 og punkt. 2 útgreinaður.

Vísandi til omanfyristandandi setur ein samd líggjarnevnd fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 14 rakstrarstað 14.796 Sernámsfrøðilig ráðgeving: Kr. 650.000 verður broytt til kr. 2.300.000.
2) Í § 16 rakstrarstað 16.904 konto 333.408 Trygdargrunnur alivinnunnar verður kr. 11.600.000 broytt til kr. 4.800.000.

1) I § 14 driftskonto 14.796 Specialundervisning: kr. 650.000 ændres til kr. 2.300.000.
2) I § 16 driftskonto 16.904 konto 333.408 Garantifond for fiskeopdræt bliver kr. 11.600.000 ændret til kr. 4.800.000.

39. Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum

Uppskot

til

Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum.

Lagtingslov om optagelse af lån til landskassen og konvertering af landskassens lån.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttanfyri Føroyar.

Stk. 2. Lán, sum verður tikið til at rinda aftur av øðrum láni, kann takast

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån til betaling af afdrag på lån, til tilbagebetaling af lån og fremskyndede betalinger af lån på og udenfor Færøerne.

Stk. 2. Lån, der bliver optaget til tilbagebetaling af andre lån, kan optages

áðrenn afturrindan, men afturrindan skal tá fremjast, áðrenn eitt ár er farið.

§ 2.

Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at umleggja lán uttanfyri Føroyar.

§ 3.

Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at taka lán til eina samlaða upphædd svarandi til 370 mió. kr. til samlaða gjaldførishall landskassans í 1991 og 1992 umframt neyðugt tiltaksgjaldføri.

§ 4.

Landskassanum er bert heimilað at upptaka lán til endamál, sum standa á fíggjarlógini.

§ 5.

Til tey einstøku endamál á fíggjarlógini, har lánsheimild longu er fingin til vega, minka hesar lánsheimildir svarandi til nýtsluna í fíggjarárinum, til hvørt einstakt endamál.

§ 6.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

inden den fastsatte tilbagebetaling, men tilbagebetalingen skal i så fald være sket, inden et år er forløbet.

§ 2.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at konvertere lån udenfor Færøerne.

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån svarende til et samlet beløb på 370 mio. kr. til landskassens likviditetsunderskud i 1991 og 1992 og desforuden nødvendig likviditetsreserve.

§ 4.

Landskassen er kun bemyndiget til at optage lån til formål, som figurerer på finansloven.

§ 5.

Til de enkelte formål på finansloven, hvor bemyndigelsen til at optage lån allerede foreligger, reduceres bemyndigelsen til at optage lån, svarende til forbruget i hvert finansår, til hvert enkelt formål.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Viðmerkingar

Hetta lógaruppskotið verður lagt fram fyri at fáa burtur ivamál, sum kunnu stinga seg upp í tí samstarvi, sum landsstýrið hevur og fer at hava við lángevarar.

Landsstýrið hevur frá ársbyrjan 1991 sett sær fyri at arbeiða við heildarlántøku. Av tí at landsstýrið enn hevur stakar lánsheimildir til einstøk endamál,

kunnu lánveitarar koma í iva um, hvørji mál løgting og landsstýri hava fyri sær, um hildið verður áfram at virka eftir hesum støku lánsheimildum.

Tí verður skotið upp at minka um allar stakar lánsheimildir í tann mun, peningur verður nýttur til hesi endamál.

Landsstýrið ætlar í framtíðini at arbeiða við tveimum sløgum av lánsheimildum. Í fyrra lagi verður løgtingið biðið um nýjáttan til at økja um skuld, sum t.d. í løgtingslóg nr. 9 frá 8. mars 1991 um upptøku av 600 mió. kr. í láni til landskassan og sum í § 3 í framlagda lógaruppskotinum um upptøku av 370 mió. kr. í láni.

Í øðrum lagi verður løgtingið biðið um eina standandi heimild til at røkja verandi lán sum t.d. í § 1 og 2 í framlagda lógaruppskoti.

Lógarbroytingin hevur sostatt við sær, at gomul skuld - íroknað kurstap, men frároknað kursvinning - altíð kann umfíggjast, uttan at neyðugt er at leggja lógaruppskot fyri tingið um hetta.

Heimildir at taka nýggj lán skulu skiljast sum heimildir at økja um samlaðu skuld landskassans við nevndu upphæddum.

Til § 1.

Løgtingslóg nr. 9 frá 8. mars 1991 heimilar landsstýrinum at taka upp til 600 mió. kr. í láni. Í við merkingunum verður sagt, at landsstýrið eisini hevur heimild til at fíggja avdráttir við lánum.

Henda grein í framlagda lógaruppskoti (§ 1) ger tað greitt, at landsstýrið kann taka lán til avdráttir og afturrindan av øðrum lánum. T.v.s. at lántøkuheimildin veksur við tí, sum verður afturgoldið, meðan hon minkar við tí, sum verður upptikið av lánum.

Harumframt kann tann samlaða skuldin fara uppum tað, sum er eftir av restlánsheimildini, tá lán verður tikið til afturrindan av øðrum lánum, men tá skal afturrindan fara fram, áðrenn eitt ár er gingið.

Tá lán eru tikin í fremmandum gjaldoyra, hevur landsstýrið higartil havt ta reglu, at kursurin við heimtøku er avgerandi fyri, hvussu stórur partur av lánsheimildini er brúktur, meðan kursbroytingar aftaná heimtøkuna ikki ávirka lánsheimildina. Soleiðis verður eisini gjørt í framtíðini. Tá goldið verður aftur uppá lán, verður kursurin við afturgjalding brúktur.

M.a. danski staturin brúkar hendan formin fyri lánsheimild. Hin annar formur kundi verið at heimilað, hvussu nógv skuldin kann verða í mesta lagi, men í tí førinum skuldi heimildin verið nóg rúm til eisini at klára allar kursbroytingar á skuldini, sum landsstýrið ikki er harri yvir. Tí verður tað gjørt við vilja, at tað verður virkað eftir eini restlánsheimild, sum veksur við nýjáttan og afturgjalding og minkar við lántøku.

Til § 2.

Á fíggjarmarknaðinum finnast nøkur fíggjaramboð (financiat instruments), sum við varisligum bróki kunnu gera, at tað fæst ein betri samanseting av skuldini, enn tað annars er møguligt at fáa. Nýggj amboð verða skapt av og á, tey er tað eisini ynskiligt at kunna bróka.

Í eini lánsavtalu eru tveir partar, lánveitari og lántakari. Í swapavtalu kemur ein triðji partur uppí, soleiðis at t.d. lántakari og triðji partur avtala at skifta um gjaldsskyldur hjá hvørjum øðrum. Lántakari og triðji partur varðveita sínar upprunaligu skyldur, og átaka sær nýggjar gjaldsskyldur mótvegis hvørjum øðrum. Roknskaparteknisk hevur lántakari upprunaliga eitt lán við ávísum treytum, hann fær eitt nýtt passiv mótvegis triðjaparti við nýggjum treytum. Netto hevur lántakarin fingið eitt nýtt passiv við nýggjum treytum. Rentuswap verður brúkt til at skifta um treytir millum fasta og variabla rentu. Valutaswap verður brúkt til at skifta um treyrir millum gjaldoyra.

Valutaswap kann nýtast, um lánveitari t.d. einans vil læna út í dollars, meðan lántakari heldur vil hava kursvanda í týskum marki ella als ongan í krónum.

Hjálagdur er annars ein orðalisti, sum lýsir nøkur av hesum fyribrigdum.

Til § 3.

Landsstýrið hevur seinasta árið arbeitt við at umleggja allar lántøkur frá at vera lántøkur til einstøk endamál, til at vera heildarlántøkur til samlaða fíggjartørv landskassans.

Við løgtingslóg nr. 9 frá 8. mars 1991 um lántøku til landskassan og við løgtingsfíggjarlógini fyri 1991, var ein nýggjur arbeiðsháttur tikin í nýtslu í stýringini av tí almenna búskapinum. Fíggjarlógin skal nú fevna um allar útreiðslur landskassans, bæði rakstur og íløgur, meðan lán verða tikin eftir heildarheimild.

Fyrr hevur tað verið so, at stórar útbyggingar kundu verða settar í gongd, uttan at hesar stóðu á fíggjarlógini. Um landsstýrið hevði lánsheimild til hesa bygging so kundi arbeiðið byrja.

Landskassin hevur ofta staðið fyri stórum virksemi, sum ikki sást á fíggjarlógini, men har virksemið var lánsfíggjað.

Við hesi broyting er endaliga avgreitt, at landskassin ongar útreiðslur kann hava, sum ikki beinleiðis standa á fíggjarlógini ella eru samtyktar við eykajáttan.

Endamálið við broytingini er at viðgera fíggjarlógina og tær fíggjarligu fylgjurnar av henni í einum, herí raðfesting av størri útreiðslum.

Landsstýrið hevur í dag fleiri leysar lánsheimildir til útbyggingar á ymsu økjunum. Heimild er m.a. at taka lán upp á 100 mió. kr. til upphøgging, restlániheimild upp á 120 mió. kr. til undirsjóvartunnil undir Vestmannasund, 185 mió. kr. til sjúkrahúsbygging, 11 mió. kr. til bygging av landsskjalasavni, umframt eina óavmarkaða heimild til skúlaúthyggingar.

Við framlagda uppskotinum er sostatt greitt, at so hvørt sum peningur verður nýttur til einstøku endamálini, so minkar hetta um lántøkuheimildina til hetta endamálið. Ætlanin er í framtíðini bert at útvega eina lánsheimild árliga. Heimildin skal samsvara gjaldføristørvi landskassans komandi árið á fíggjarlógini ella framløgdum fíggjarlógaruppskoti. Av tí at tað er torført at meta um inntøkur landskassans og ávísar av útreiðslum landskassans, er tað harumframt neyðugt at hava eitt hóskandi tiltaksgjaldføri (likviditetsreserva). Inntøkur og útreiðslur landskassans eru størri ella minni ymsu árstíðirnar og hetta ger eisini tiltaksgjaldførið neyðugt.

Landsstýrið arbeiðir miðvíst fram ímóti at minka um lánitørv landskassans ár undan ári. Í hesum sambandi verður arbeitt við raðfesting av útreiðslum og heildarfígging av øllum útreiðslum á fíggjarlógini, tvs. bæði rakstri og íløgum, og ætlar landsstýrið, frá fíggjarárinum 1993 at rokna, ikki at økja um skuld landskassans.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 39/1991: Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. november 1991 og undir 1. viðgerð 26. november 1991 beint í Fíggjarnevndina.

Nevndin hevur havt fund um málið við landsstýrismannin í fíggjarmálum og landsbankastjóran.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) er samdur við landsstýrinum í, at í framtíðini skal verða miðað eftir at fáa til vega frá løgtinginum heildarheimildir til lántøku, um lántøka er neyðug til loysn av fíggjartørvi landsins.

Meirilutin tekur undir við, at lógaruppskotið (§§ 4 og 5) staðfestir tað, sum seinnu tíðina hevur verið landsstýrisins politikkur, at allar útreiðslur - bæði til rakstur og íløgur, sjálvt um prinsipiellar heimildir eru veittar í øðrum lógum - svarandi til hvørt árs nýtslu, skulu verða heimilaðar á viðkomandi árs fíggjarlóg ella eykafíggjarlóg (eykajáttan).

Meirilutin er samdur við landsstýrinum í, at hetta er ein tryggleiki hjá teimum lánstovnum, sum landsstýrið arbeiðir saman við, at eins og hetta gevur landsstýri og løgtingi betur møguleika at stýra fíggjarvirkseminum landsins.

Meirilutin tekur tí undir við at veita landsstýrinum heimild til at taka eitt lán upp á 370 mió. kr. at dekka gjaldføristørv landskassan í 1991 og 1992 umfram neyðugt tiltaksgjaldføri.

Eisini tekur meirilutin undir við uppskoti landsstýrisins um heimild til at taka lán, um hetta er neyðugt ella skynsamt til:

- rindan av avdráttum upp á lán
- afturrindan av lánum
- framskundaða afturrindan av lánum

Hetta er galdandi bæði fyri føroysk lán og uttanlandslán.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) tekur undir við einum parti av uppskoti landsstýrisins. Minnilutin metir tað verða rætt, at landsstýrið fær heimild til at umleggja lán uttanfyri Føroyar, at landskassin í framtíðini bert kann upptaka lán til endamál, sum standa á fíggjarlógini, og at verandi lánsheimildir minka samsvarandi nýtsluni á fíggjarlógini.

Minnilutin vísir á, at lánsheimild, ið givin verður landsstýrinum at taka nýtt lán til at afturrinda gamalt, av einihvørjari orsøk møguliga kann verða brúkt til annað endamál enn ætlað, av tí at skotbráið fyri afturgjalding av tí gamla láninum sambært uppskoti landsstýrisins verður sett til eitt ár. Mælt verður tí til, at tílík umskiftislán verða oyramerkt og bundin á serstakari konto til afturgjaldingin er framd.

Minnilutin tekur ikki undir við, at landskassin fær heimild til at læna 370 mió. kr. Ein partur av hesum peningi skal nýtast til ætlað hall á fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins fyri 1992, men tingið hevur ikki samtykt hetta uppskot enn.

Minnilutin metir, at komandi fíggjarlóg vegna vandaniklu búskaparstøðu landsins eigur at hanga saman uttan økta lántøku. Verður einki undirskot á komandi fíggjarlóg, verður ikki neyðugt at læna allan henda pening. Minnilutin heldur tað vera rætt, at landskassin hevur umleið 100 mió. í avlopsgjaldføri at taka til og skjýtur tí upp, at landskassanum verður heimilað at læna 280 mió. kr.

Sostatt setir minnilutin (Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) fram til uppskot landsstýrisins soljóðandi:

broytingaruppskot

1) Til § 1, stk. 2 verður skoytt uppí:
"Lán, sum verða tikin til at rinda aftur onnur lán, skulu oyramerkjast til endamálið og skulu setast inn á serstaka konto, til afturgjaldingin er framd."

1) Til § 1, stk. 2 tilføjes:
"Lån, der optages til at tilbagebetale andre lån, skal øremærkes til formålet og skal indsættes på særlig konto, indtil tilbagebetalingen er effektueret."

2) § 3 gongur út, og sum nýggj § 3 verður sett:
"Landsstýrinum verður heimilað at taka lán til eina samlaða upphædd svarandi til 280 mió. kr. til samlaða gjaldførishall landskassans í 1991 umframt neyðugt tiltaksgjaldføri."

2) § 3 udgår, og som ny § 3 indsættes:
"Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån på et samlet beløb, der svarer til 280 mio. kr. til det samlede landskasse likviditetsunderskud i 1991 og desforuden nødvendigt likviditetsreserve."

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen) tekur støðu í tingsalinum.

40. Avtala um laksafiskiskap, sum partur av fiskivinnuavtaluni við Ísland

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 24. apríl 1991 sum løgtingsmál nr. 103) 1990 (vetrarting og undir 1. viðgerð 24. apríl 1991 beint í Marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt samrøður við løgmann, John Petersen, landsstýrismann, og Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóra, ið hava greitt frá gongdini í málinum og frá fundinum í NASCO í juni mánað 1991.

Eisini hevur nevndin havt fund við Felagið Laksaskip og semingsmannin Jógvan Joensen, grannskoðara, sum samráddist um málið millum Felagið Laksaskip og Orna Vigfússon. Jalgrím Hilduberg hevur eisini verið á fundi.

Nevndin ger vart við, at landsstýrið hevur ikki fylgt vanligari mannagongd í hesum máli við tað, at avtala er gjørd við privat felag um sølu av føroyskari kvotu, áðrenn góðkenning fyriliggur frá løgtinginum ella marknaðarnevndini.

Nevndin heldur, at landsstýrið við at senda hjálagda bræv kann hava bundið seg til ikki at kunna samráðast um veiðirættindi undir Íslandi uttan at ganga undir tær treytir, at laksur ikki kann veiðast undir Føroyum eftir 1993.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Olaf Olsen, Birgir Danielsen, Sverre Midjord og Heini Johansen) setir út frá onanfyristandandi í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til løgtingslóg nr. 9. frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjálagda brøv til íslendskar myndugleikar um, at avtala um laksaveiði á ytru føroysku landleiðini verður partur av fiskivinnusamstarvinum millum Ísland og Føroyar.

Henda góðkenning er tó bert galdandi fyri tey ár, har semja um endurgjald fyriliggur frammanundan. Landsstýrið skal eisini góðkenna endurgjaldsupphæddirnar.

Heitt verður á landsstýrið um at bera so í bandi, at endurgjaldið verður býtt millum skip og manningar, har tað er gjørligt.

Mælt verður landsstýrinum til at taka upp samráðingar við íslendingar um, at føroyingar hóast hesa avtalu reka royndarveiði eftir laksi í føroyskum sjóøki.

Ein minniluti (Edmund Joensen) førir fram, at hetta málið er av stórum týdningi og tí hevði uppiborið eina gjølla viðgerð og støðutøku í løgtinginum, áðrenn landsstýrið avgjørdi henda handil, um at selja okkara laks til áhugabólkar av tráðufiskifólki í øðrum londum gjøgnum Orra Vigfússon í Íslandi.

Ein stórur ivaspurningur er eisini, um lógarheimild í heila tikið er, til at gera slíkan handil eftir lógini um fiskiavtalur við fremmand lond, tí her er talan um tveir privatar partar, sum handla sínámillum við peningi um ávís landsvirðir.

Lógin, sum víst verður til, er nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond, og er § 1 soljóðandi:

"Landsstýrinum er, hóast lóg nr. 8 frá 29. mars 1978, um fiskiveiðu á landleiðini, heimilað at geva fremmandum ríkisborgarum við fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í fremmandum landi, loyvi at veiða á landleiðini. Treyt fyri loyvinum er, at avtala er gjørd við avvarðandi land, og at avtalan er góðkend av løgtinginum, tó kann Marknaðarnevnd løgtingsins, um løgtingið ikki er saman, geva fyribils góðkenning".

Staðfestast kann, at landsstýrið hevur avreitt laksin uttan loyvi frá Marknaðarnevndini, løgtinginum, ávísum laksafiskimonnum og møguliga við ongari lógarheimild heldur.

Í sjálvum løgtingsmálinum er málið illa lýst, men Marknaðarnevndin hevur fingið eina fundarfrágreiðing av fundinum, sum var 26. februar 1991 í Keypmannahavn, og í henni framgongur, at tað ikki er samsvar við tað, sum stendur í løgtingsmálinum um, at veiðirættindini hjá okkum við Ísland og laksaveiðan við Føroyar av íslendsku umboðunum vóru bundin saman, tvørturímóti framgongur

í fundarfrásøgnini, at íslendski fiskimálaráðharrin leggur stóran dent á ikki at blanda tingini saman, men viðgerða tey hvørt sær.

Tí má tað vera landsstýrið sum hevur vavt laksaspurningin beinleiðis upp í botnfiskakvotuna hjá okkum í Íslandi.

Tað sæst eisini, at avtalan um at selja laksin, ikki hevur ávirkað at okt botnfiskakvotuna, tí í sínum fyrsta innleggi hevur íslendski fiskimálaráðharrin verið inni á einum ávísum niðurskurði og sigur: "...kanska ein afturvendan til 1984 tølini", áðrenn hann viðgjørdi laksaspurningin, og avtalan í ár er verri enn í 1984, tí av teimum 8.500 tons, sum er tað sama í ár sum í 1984, eru nú bert góð 1.600 tons toskur, meðan tað í 1984 vóru 2.000 tons toskur.

Tey 500 tonsini av fiski og endurgjaldið, sum er grundað á ávísan prosentpart av landingarvirðinum av laksakvotuni, kunnu ikki góðtakast sum nóg góð avtala, tí vanligt er, at til tráðufiskiskap verður laksur handfaður fyri 10-20 ferðir vanligan handilsprís.

Tá henda laksaavtala ikki tryggjar okkum botnfiskakvotuna, er handilsliga vánalig, veksur um arbeiðsloysið í Føroyum og er heimildarliga ivasom, tekur minnilutin ikki undir við uppskotinum: Avtala um laksafiskiskap, sum partur av fiskivinnuavtaluni við Ísland.

Eitt annar minniluti (Hergeir Nielsen) góðtekur ikki, at privatir felagsskapir samráðast við onnur lond um landsrættindi okkara. Minnilutin góðtekur heldur ikki, at landsstýrið einsamalt tann 22. apríl 1991 skrivliga bindur seg mótvegis íslendskum myndugleikum (Sjávarútvegsráðuneyti) og biður um løgtingsins góð kenning (í tingmáli nr. 103/90) tveir dagar seinni.

Átalað verður soleiðis, at landsstýrið gjøgnum privatan felagsskap ger sáttmála, sum er bindandi fyri løgtingið, uttan frammanundan at hava lagt málið fyri løgtingið ella Marknaðarnevndina. Hetta er beinleiðis brot á løgtingslóg um fiskiavtalur við fremmand lond.

Óneyðuga stóran skund má landsstýrið sigast hava havt, tá ið laksamálið als ikki varð viðgjørt ella kom aftur úr nevnd í undanfarnu tingsetu.

Í skrivinum frá 22. apríl 1991 til íslendskar myndugleikarnar hevur landsstýrið sagt frá, at tað játtar "at bjóða til sølu laksakvotur, sum samráðst verður um fram til NASCO árini eftir."

Tað verður ikki skilað til, hvussu nógv ár talan er um.
Eisini sigur landsstýrið í sama skrivi, at tað ikki fer at geva fiskiloyvi til laksaveiði á ytru landleiðini.

Hóast hesa greiðu orðing frættu vit um dagarnar, at landsstýrið hevur givið loyvi til royndarveiðu eftir laksi.

Tað er ongastaðni skjalprógvað, at íslendska stjórnin knýtir laksamálið at botnfiskakvotuni. Tvørturímóti verður tað upplýst í málinum, at íslendska stjórnin

ikki tengir málini saman, og eisini verða somu tíðindi borin av fjølmiðlunum.

Vísandi til frammanfyristandandi verður sett fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka málið til nýggja viðgerð.

Hin triði minnilutin (Tordur Nielasen) førir fram, at vegna nógvar ógreiðar spurningar í hesum prinsipiella máti, mælir minnilutin til, at landsstýrið tekur málið aftur og við nágreiniligari upplýsingum leggur málið aftur fyri tingið.

Samsvarandi hesum verður sett fram:

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at taka løgtingsmál nr. 40/91: Avtala um laksafiskiskap sum partur av fiskivinnuavtaluni við Ísland (lm. 103/90) aftur.

41. Sunnu- og halgidagar sum legudagar hjá veiðiflotanum

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum saman við Fiskivinnunevndini at gera reglugerð um sunnu- og halgidagar sum legudagar hjá føroysku landgrunnunum.

Viðmerkingar

Tað frættist, at landsstýrið hevur samtykt at leggja allan flotan í besta streymloysi 15. desember og 20 dagar fram.

Tað frættist eisini um stóra misnøgd millum veiðumenn, serliga útróðrarmenn, sum frammanundan eru sera hart raktir av tiltokum landsstýrisins, ið m.a. formaður Fiskimannafelagsins heldur niðja beint ímóti at avtaka línuveiðina.

Upp er komið, at landsstýrið heldur ikki í hesum fori hevur lagt samtykt sína fyri Fiskivinnustarvsnevndina, so sum lógin um fiskiráð sigur.

Tað er í samljóð við gamlan føroyskan og kristnan sið, at friður valdar sunnu- og halgidagar. Við at venda aftur til hendar rótføroyska sið og friða grunnarnar sunnu- og halgidagar, láast o.u. 60 legudagar hvørt ár, ið er á leið tað sama, ið miðað hevur verið ímóti.

Ein tílík friðing órógvar ikki nógv útróðrarflotan, ið vanliga plagar at liggja um halguna.

Ein útróðrarbátur, ið rør út alt árið, hevur úr 60 upp til 120 veiðidagar, hvi onkur einstakur fer uppum.

Trolarar og tey størru línuskipini hava tað dupult av árligum veiðidøgum og meira enn tað. Tí er tað greitt, at trýstið á landgrunnin kemur ikki fyrst og tremst frá útróðrarflotanum, so sum onkur tykist vilja vera við.

Tað er líka greitt, at hetta trýst má minka.

Tí verður hetta uppskot um legudagar sunnu- og halgidagar sett fram. Tað samsvarar gamlari siðmenning her á landi, givna av Guði.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 41/1991: Sunnu- og halgidagar sum legudagar hjá veiðiflotanum.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 26. november 1991 og eftir 1. viðgerð tann 5. desember 1991 beint í Fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið, og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) vísir á kunngerð nr. 101 frá 29. november 1991, har Føroya landsstýri saman við Fiskivinnunevnd løgtingsins hevur ásett, at allir trolarar, fróknað ídnaðartrolarar, liggja í tíðarskeiðinum frá 16. desembur 1991 til 5. januar 1992, báðir dagar fróknaðir, og at garna-, snellu- og línuskip, størri enn 90 tons (BRT), liggja í tíðarskeiðinum frá 19. desember 1991 til 8. januar 1992, báðir dagar fróknaðir. Lýsing er ásett, at allir trolarar, fróknað ídnaðartrolarar, og garna-, snellu- og línuskip, størri enn 90 tons (BRT), liggja í tíðarskeiðinum frá 12. apríl 1992 til 21. apríl

1992, báðir dagar frokknaðir. Tiltakið við legudøgum er sett í verk til tess at minka um veiðitrýstið á grunnunum.

Meirlutin vísir eisini á sáttmálaósemjuna í januar mánað, sum ikki endaði, fyrr enn løgtingið tann 22. januar 1992 samtykti løgtingslóg um loysn av sáttmálaósemju, og lógu skipini longri enn ætlað var við ásettu legudøgunum.

Tá landsstýrið samtan við Fiskivinnunevndini hevur heimild at áseta legudagar, tekur meirlutin ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen, Heini O. Heinesen og Niels Pauli Danielsen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot Kristiliga Fólkafloksins, Føroya Framburðs- og Fiskivinnufloks.

42. Norðurlendskur millumlandasáttmáli um fyribyrging av oljudálking av havinum

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrið boðar donsku stjórnini frá, at heimastýrið góðkennir, at millumlandasáttmáli millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svørîki um samstarv, um fyribyrging av oljudálking av havinum verður settur í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

"København-aftalen" er ein sáttmáli frá 16. september 1971 millum Danmark, Noreg, og Svørîki um samstarv um fyribyrging av oljudálking av havinum.

Í samband við norðurlendska verkætlan um avmarking av dálking av havinum avgjørdu teir norðurlendsku umhvørvismálaráðharrarnir at nútímansgera sáttmálan.

Einasta broyting í mun til tann gamla er, at Ísland er komið við í avtaluna og at avtalan er víðkað frá bara at fevna um olju til "eller andre skadelige stoffer."

Fyri Føroyar verður ikki neyðugt at seta nýggj tiltøk í verk orsakað av hesi avtalu.

Sum skjal verður hjálagt "Aftale mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige om samarbejde vedrørende bekæmpelse af forurening af havet med olie eller andre skadelige stoffer."

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 42/1991: Norðurlendskur millumlandasáttmáli um fyribyrging av oljudálking av havinum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. november 1991 og eftir 1. viðgerð 9. december 1991 beint í Umhvørvisnevndina.

Í uppskotinum mælir landsstýrið løgtinginum til at samtykkja, at heimastýrið góðkennir millumlandasáttmálan millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki um samstarv, um fyribyrging av oljudálking av havinum. Í sambandi við norðurlendska verkætlanina um avmarking av dálking av havinum verður hesin sáttmáli, eftir avtalu millum norðurlendsku umhvørvismálaráðharranar nútíðargjørdur. Høvuðsbroytingin í sáttmálanum er annars í mun til gamla sáttmálan, at Ísland er komið við í avtaluna, og at avtalan er víðkað frá bert at fevna um olju, til eisini at fevna um onnur vandamikil evni.

Landsstýrið upplýsir í viðmerkingunum, at tað ikki er neyðugt at seta í verk nýggj tiltøk í Føroyum, orsakað av hesari avtalu. Umhvørvisnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

43. Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v. m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

Lagtingslov om ændringer i lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m. v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 vedrørende registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1) Sum nýggja § 2, stk. 1 verður sett:

"Virðisgrundarlagið at motorakførum, ið eru innflutt til sølu í Føroyum, er søluprístur frá seljara í Føroyum til keypara, frokað at akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og eykaútgerð. Í virðisgrundarlagið inngongur fakturaprístur, farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, uppskipan og klárgerð, men ikki vinningur, skrásetingargjald sbr. § 1, skrásetingarsýn, trygging, innflutningsgjald, toftur, vegskattur o.l. í Føroyum."

2) Sum nýggj § 3 verður sett:

"Persónvognar undir kr. 15.000: 50%. Kr. 15.000 - 30.000: kr. 7.500 av 15.000 og 90 % av restini.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi tann 1. januar 1992.

Stk. 2. Akfør, ið verða fráboðað til skráseting í stk. 1 nevnda dag og seinni, koma undir hesar reglur.

1) Som ny § 2, stk. 1 indsættes:

"Værdigrundlaget for motorkøretøjer, som er indført til salg på Færøerne, er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, iberegnet at køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr. I værdigrundlaget indgår faktunapris, fragtafgift, transportforsikring, vareafgift, losning og klargørelse, men ikke sælgers avance, registreringsafgift jfr. § 1, registreringsgebyr, forsikring, indførelsafgifter, told vejskat o.l. på Færøerne."

2) Som ny § 3 indsættes:

"Personvogne under kr. 15.000: 50%. Kr. 15.000 - 30.000: kr. 7.500 af 15.000 og 90% af resten.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1992.

Stk. 2. Motorkøretøjer, som bliver angivet til registrering den i stk. 1 nævnte dag og senere, er omfattet af disse bestemmelser.

Viðmerkingar

Sambært løgtingslóg um serligt og eyka innflutningsgjald er innflutningsgjaldið fyri akfør, ið verða innflutt til søltu í Føroyum 33%.

Broytingarnar í tolllóggávuni 1. januar 1992 hava við sær, at GATT-tollur skal áleggjast akførum, ið ikki hava uppruna í EF.

GATT-tollurin á motorakførum er frá 3% til 22% alt eftir, hvørji akfør, talan er um.

Orsøkin til broytingina í hesari lóg er, at í virðisgrundarlagið, sum skráseting argjald skal roknast av, inngongur serligt og eyka innflutningsgjald.

Skal GATT-tollurin haraftrat leggjast til virðisgrundarlagið, koma akfør, ið ikki hava uppruna í EF, at vera munandi dýrari, enn neyðugt er sambært teimum fyrimunum, ið Føroyar hava givið EF viðvíkjandi GATT-tolli ella tolli frá triðjalondum.

Av tí at skrásetingargjaldið er eitt innanlands gjald, fellur hetta uttan fyri sáttmálan millum EF og Føroyar.

Landsstýrisins uppskot er tí, at virðisgrundarlagið, tað er tað grundarlag, ið skrásetingargjaldið skal roknast av, er søluprísurin frá seljara til keypara í Føroyum.

Í virðisgrundarlagið inngongur fakturaprísur, farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, uppskipan og klárgerð.

Broytingin er sostatt, at serligt og eyka innflutningsgjald og tann GATT-tollur, ið kemur aftaná 1. januar 1992, ikki verða roknað við í virðisgrundarlagið.

Hetta hevur gjørt tað neyðugt at broyta sjálva útrokningina av skrásetingargjaldinum. Sum dømi um hetta kann vísast til niðanfyri standandi yvirlit. Eitt akfar, ið sambært núgaldandi reglur hevur eitt virðisgrundarlag, sum er kr. 57.937 rindar í dag kr. 29.941 í virðisgjaldi.

Aftaná 1. januar 1992 kemur hetta akfar at hava eitt virðisgrundarlag, sum er kr. 43.878, av tí at serligt og eyka innflutningsgjald t.v.s. 33% eru tikin burtur úr grundarlagnum, fyri hetta akfar verður virðisgjaldið kr. 29.460 ella umleið kr. 500 lægri enn í dag.

Afturat virðisgjaldinum skal rindast 21 kr. pr. kg. í vektgjaldi. Hetta verður óbroytt.

Sum heild kann sigast, at skrásetingargjaldið er umleið kr. 200 lægri fyri akføring aftan á 1. januar 1992 enn í dag.

Hinvegin má ásannast, at GATT-tollur á motorakførum kemur at geva meirinntøku hjá landskassanum í 1992, soleiðis at nettoúrslitið verður nøkulunda óbroytt.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 43/1991: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v. m.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. november 1991 og eftir 1. viðgerð 9. desember 1991 beint í Skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirihluta og tveir minnihlutar.

Meirihlutin (Vilhelm Johannesen, Eyðun Videro og Jørgen Niclasen) vísir á, at talan er um konsekvens broytingar, orsakað av øðrum broytingum í tí stóra lógarhópinum á tolløkinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnihlutin (Finnbogi Arge) tekur stoðu í tingsalinum.

Ein annar minnihluti (Lasse Klein) tekur stoðu í tingsalinum.

44. Avtøka av løgtingslóg um býti av sosialu útreiðslunum

Uppskot

til

Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býti av sosialu útreiðslunum.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 74 frá 24. oktober 1978 verður sett úr gildi.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om fordeling af sociale udgifter.

§ 1.

Lagtingslov nr. 74 af 24. oktober 1978 ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Tað hevur verið nógv orðaskifti í seinastuni um arbeiðsbýtið í millum landskassan og kommununar.

Landsstýrismaðurin í kommunumálum Jógvan Sundstein hevur skotið upp fyri bý- og bygdarráðnum eina kommunusamanlegging soleiðis, at tað verða bert 7 kommunur í Føroyum í staðin fyri sum nú 50 kommunur.

Tað vil siga, at vit skulu avtaka tær flestu kommununar. Tað man vera ivasamt um tað er politiskur meiriluti í løgtinginum fyri einari so grundleggjandi broyting, tí kann ikki roknast við, at kommununar verða samanlagdar (avtiknar) við lóg. Sum er kunnu kommunur sjálvar avgera at leggja saman ella at samarbeiða, har tørvur er fyri tí.

Tær flestu kommununar eru illa fyri fíggjarliga, eisini tær størstu, so ein samanlegging hjálpir einki upp á fíggjartupulleikarnar.

Kommununar gjalda til landskassan fyri fleiri málsøkir, sum tær ikki hava ábyrgd av ella minni ávirkan á.

Hetta skapar eina stóra dupulta umsiting á Føroya gjaldstovu og eisini áti í kommununum, so her er peningur at spara í umsiting.

Um hesi gjøld vóru avtikin, vildi hetta bøn munandi um fíggjarstøðuna hjá kommununum.

Tað, sum er ótrygt fyri kommununar er, at landsstýrissamgongan hevur skorið so gott sum allar studningar til kommununar burtur.

Tí er tað einki órímiligt, um hesi gjøld verða avtikin frá 1. januar 1992 at rokna.

Kommunuskatturin fyri 1992 er mettur til	kr.	570,000,000
Partur í sosialum útreiðslum	kr.	47,743,949
Landsvegagjøld	kr.	16,427,905
Eftir til kommunurnar	kr.	505,828,146

Hjálagt er skjal við væntaðum gjøldum fyri 1992 býtt á kommunur. + skjal.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 44/1991: Avtøka av løgtingslóg um býti av sosialu útreiðslunum.

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 29. november 1991 og eftir 1. viðgerð 9. desember 1991 beint í Fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) vísir á, at landsstýrið arbeiðir við fíggingarspurninginum hjá kommunum og hevur Fíggjarnevndin á einum fundi við kommunurnar á Hotel Hafnia boðað frá, at landsstýrið arbeiðir við málinum.

Meirlutin setir sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge, Flemming Mikkelsen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

45. Broyting í løgtingslóg um landsvegir

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsvegir.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir verður gjørd henda broyting:

§ 3, pkt. 3 og pkt. 4 fella burtur og pkt. 5 og pkt. 6 verða pkt. 3 og pkt. 4.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsveje.

§ 1.

I lagtingslov nr. 51 af 25. juli 1972 om landsveje foretages følgende ændring:

§ 3, pkt. 3 og pkt. 4 bortfalder og pkt. 5 og pkt. 6 ændres til pkt. 3 og pkt. 4.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Av tí at landsstýrið í sínum fíggjarlógaruppskoti hevur avtikið so gott sum allar studningar til kommunurnar, loyvir Tjóðveldisflokkurin sær at skjóta upp fyri Føroya løgtingi, at avtaka landsvegagjaldið frá 1. januar 1992.

Hetta gjald er mett til kr. 16.427.905 fyri 1992.

Sum dømi skal verða nevnt, at asfaltstudningurin hevur seinastu árini ligið um 5,5 mió. kr. Henda hevur landsstýrið strikað frá 1. januar 1992.

Á fíggjarlógini í ár eru bert 700.000 kr. til smærri havnir og lendingar, so sigast kann, at hesin studningur eisini er avtikin. Studningurin til smærri vegir sær eisini út til at fella burtur. Annars verður víst til løgtingsmál nr. 44/ 1991: Avtøka av løgtingslóg um býti av sosialu útreiðslunum.

Hjálagt er skjal yvir væntaðar útreiðslur til almannamál og landsvegaavgjald í 1992 býtt á kommunur.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 45/1991: Broyting í løgtingslóg um landsvegir.

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 29. november 1991 og eftir 1. viðgerð 9. desember 1991 beint í Fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og vísir til álit sítt í løgtingsmáli nr. 44/1991.

46. Grunn at umsita farloyvisgjald

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á Føroya landsstýri um at leggja fyri Føroya løgting uppskot um stovnsetan av grunni, sum samskipar inn- og útgjalding til tey starvsfólk, sum ikki fáa alla løn sína undir sjúkra og/ella burðarfarloyvi frá ti almenna.

Viðmerkingar:

Sum støðan er viðvíkjandi gjaldi fyri løn undir sjúkra- og burðarfarloyvi er reiðiliga ójavnt, hvussu hetta rakar ymisk arbeiðspláss. Tímalønt fáa goldið av Almannastovuni. Alment sett fáa goldið av tí almenna. Tey, sum eru lønt eftir S&K-sáttmála fáa ein part frá arbeiðsgevara. Onnur fáa alt goldið av arbeiðsgevara.

Henda skipan ger, at arbeiðspláss, sum hava mest kvinnur settar í starv, gjalda meir í farloyvisløn, enn arbeiðspláss, har bert ella mest menn eru í arbeiði.

Henda skipan hevur tann vansa, at tá eitt virki skal seta fólk í starv, er møguleiki fyri, at menn verða tiknir fram um kvinnur av hesi orsøk. Fyri eitt lítið virki kann hetta fíggjarliga verða ein spurningur um lív ella deyð. At hesin spurningur eisini ávirkar almennar stovnar sæst av viðmerkingunum, sum Almannastovan hevur til fíggjarlógaruppskotið fyri 1992. Har verður á blaðsíðu 227 sagt soleiðis: Heitt verður á landsstýrið, um at finna eina felagsskipan fyri almennar stovnar, (ein grunn ella eina serstaka játtan, ið kann nýtast til endamálið, at javna út trýstið av hesum á summum stovnum).

Í vón um, at inngjaldingin til løn undir sjúkra- og burðarfarloyvistíðini gerst meiri jøvn fyri virkini og tryggja, at eitt møguligt sjúkra- ella burðarfarloyvi ikki kolrennur tey og at tryggja, at gjald til starvsfólk undir sjúkra- ella burðarfarloyvi

ikki ger, at kvinnur verða verri fyri enn menn, tá fólk verður sett í starv, tí verður hetta uppskot lagt fram.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 46/1991: Gjaldi at ansita farloyvisgjald.

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 29. november 1991 og eftir 1. viðgerð 9. december 1991 beint í Arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir eina samd Arbeiðaramálanevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

47. Broyting í løgtingslóg um serligt gjald av brennuolju v.m.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt gjald á brennuolju v. m.

§ 1.

Í § 2 í løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 um serligt gjald á brennioljju v.m. verður gjørd hendan broyting:

Aftan á orðini: "Skip yvir 20 BRT" verður sett:

" fiskavirkir, fiskamjølsvirkir, SEV".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie m. v.

§ 1.

I § 2 i lagtingslov nr. 99 af 1. oktober 1986 om særlig afgift af brændselsolie m.v. foretages følgende ændring:

Efter ordene: "Skibe over 20 BRT" indsættes: "fiskevirksomheder, fiskemelsfabrikker, SEV".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Kreppan í føroyska samfelagnum er í dag sera stór og er fyri ein part orsakað av, at okkara vinnulív ikki er kappingarført. Ein orsøk til verri kappingarføri liggur í, at okkara vinnuvirkir hava dýrari orkugjald enn okkara grannalond. Eitt dýrkandi lið í hesum er oljuavgjaldið, sum varð ásett av samgonguni 1985 - 1988.

Støðan framyvir, nú okkara vinnuvirkir vegna El-sáttmálan, fara at fáa meiri kapping enn fyrr, ger tað neyðugt at geva vinnumi betri møguleikar. Skulu vit bugsa um at fáa samfelagið fíggjarliga upp á rættkjøl aftur, er neyðugt við einum væl virkandi vinnulívi. At avtaka oljugjaldið er eitt stig á leiðini til at geva vinnulívinum betri livilíkindir.

Haraftrat lækkar broytingin el-rokningina hjá húsarhaldonum. Hetta lættir fíggjarliga um - serliga hjá teimum, sum eru fíggjarliga illa fyri.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 47/1991: Broyting í løgtingslóg um serligt gjald av brennioljut v. m.

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 9. desember 1991 og eftir 1. viðgerð tann 15. desember 1991 beint í Ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Frank Davidsen og Sommer Winther) førir fram, at samgongan arbeiðir við at spara stórar upphæddir á fíggjarlógini, og tí er torført at minka um gjøld til landskassan, men meirilutin er eisini greiður yvir, at vinnan, sum skal útvega okkum øllum útkomuna, hevurilt við at klára seg, og tí verður eisini arbeitt við at útvega landskassanum pening aðrar vegir, ella at spara á øðrum økjum, so vinnuni kann verða lív lagað. Hetta er alneyðugt, men meirilutin vil bíða eftir útspæli samgongunnar, og tekur tí ikki undir við uppskotinum og setir eitki uppskot fram.

Minnilutin (Edmund Joensen og Asbjørn Joensen) tekur undir við málinum, men mælir til, at eisini ídnaðarvirkir annars, ið eftir umsókn verða skrásett sum framleiðsluvirkir við støtri oljunýtslu, verða undantikin brennioljugjaldi og mælir tinginum til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins við framman fyri nevndu broyting. Samsvarandi hesum setir minnilutin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot Sambandsfloksins

Í § 1 verður skoytt uppí: "og ídnaðarvirkir annars, ið eftir umsókn verða skrásett sum framleiðsluvirkir við støri oljunýtslu."	I § 1 tilføjes: "og industrivirksomheder, som efter ansøgning bliver registreret som produktionsvirksomheder med større olieforbrug."

48. Løgtingslóg um kavaravinnu

Uppskot

til

Løgtingslóg um kavaravinnu.

§ 1.

Tann, sum røkir vinnu sum kavari á landleiðini ella frá føroyskum skipi, skal hava loyvisbræv sum kavari. Undantiknir eru persónar, sum starvast á fremmandum skipi og hoyra til manningina og persónar hjá sjóverjuni, tá ið arbeiðið verður útint í tænasturi.

Stk. 2. Tann, sum hevur onkran at útinna arbeiði sum kavari, hevur skyldu at kunna seg um, at viðkomandi hevur tørvandi kavarabræv, jbr. § 6.

Stk. 3. Hóast reglurnar í stk. 1 og 2 kunnu føroysk skip í útlandinum hava útlendskar kavarar við ongum loyvisbrævi, tá ið teir ikki hoyra til manningina.

§ 2.

Hesi kavarabrøv verða givin, jbr. tó § 3:

1) Kavarabræv sum tungur kavari, sum gevur rætt at útinna arbeiði sum kavari niður á 50 m dýpi við tungari kavaraútgerð og við vanligari luft sum andingarevni jbr. stk. 2.

2) Kavarabræv sum lættur kavari, sum gevur rætt at útinna arbeiði sum kavari niður á 50 m dýpi við lættari kavaraútgerð og við vanligari

Lagtingslov om dykkerarbejde.

§ 1.

Den, der erhvervsmæssigt udfører dykkerarbejde på færøsk skib, skal være i besiddelse af erhvervsdykkerbevis. Undtaget herfra er personer, som arbejder fra fremmed skib og hører til dettes besætning, samt personer under forsvarskommandoen, for så vidt angår arbejde udført i tjenesten.

Stk. 2. Den, der anvender personer til dykkerarbejde, er pligtig at forvisse sig om, at disse er i besiddelse af gyldigt erhvervsdykkerbevis, jfr. § 6.

Stk. 3. Uanset stk. 1 og 2 kan der fra færøske skibe i udlandet anvendes udenlandske dykkere uden erhvervsdykkerbevis, når de pågældende ikke tilhører skibets besætning.

§ 2.

Der udstedes følgende erhvervsdykkerbeviser, jfr. dog § 3:

1) Bevis som tung dykker, der giver ret til at udføre dykkerarbejde på vanddybder indtil 50 m med tung dykkerudrustning og med almindelig atmosfærisk luft som åndemiddel, jfr. stk. 2.

2) Bevis som let dykker, der giver ret til at udføre dykkerarbejde på vanddybder indtil 50 m med let dykkerudrustning og med almindelig at-

luft sum andingarevni jbr. stk. 3.

Stk. 2. Sum "tung kavaraútgerð" er at skilja útgerð, bert egnað til uppihald á fastari grund (havbotni, palli og líknandi). Tung kavaraútgerð loyvir ikki skjóta broyting av kavingardýpi, við egnum rørslum ella í einari handavending at sleppa sær av við loddini. Tung kavaraútgerð hevur vanliga støðugan gjóstur av andingarevni í hjálminum og samband millum hjálm og drakt.

Stk. 3. Við eina "lætta kavaraútgerð" er at skilja einhvør onnur útgerð enn tung kavaraútgerð, gjørd soleiðis, at kavarin skjótt kann broyta kavingardýpd, antin við egnum rørslum ella við einari handavending at sleppa sær av við loddini. Í lættari kavaraútgerð verður andingarevni vanliga latið við sjálvvirkandi skipan.

mosfærisk luft som åndemiddel, jfr. stk. 3.

Stk. 2. Ved en "tung dykkerudrustning" forstås en udrustning alene egnet til en dykkers ophold på fast underlag (havbund, platform eller lignende). Tung dykkerudrustning giver ikke mulighed for hurtig ændring af dykkedybde ved egen bevægelse eller opnåelse af positiv opdrift ved med få enkle greb hurtigt at frigøre sig for afvejningsmateriel. Tung dykkerudrustning har normalt konstant åndemiddelventilering af hjelm og fri forbindelse mellem denne og den tilhørende drakt.

Stk. 3. Ved en "let dykkerudrustning" forstås enhver anden udrustning end en tung dykkerudrustning, udformet så dykkeren hurtigt kan ændre dykkedybde enten ved egen bevægelse eller ved med få enkle greb at frigøre sig for afvejningsmateriel. Let dykkerudrustning har normalt tilførsel af åndemiddel gennem automatisk doseringsventil.

§ 3.

Landsstýrið kann avgera, at út um tey í § 2 nevndu vinnukavarabrøv kann bræv sum blandingsgaskavari verða givið.

Stk. 2. Bræv sum blandingsgaskavari loyvir at brúka blandingsgas sum andingarevni, tá kavað verður við lættari ella tungari kavaraútgerð, jbr. § 2.

Stk. 3. Við blandingsgass er at skilja eitthvørt andingarevni, har onnur luftsløg enn rein vanlig luft ella sama luft-

§ 3.

Landsstyret kan bestemme, at der udover de i § 2 nævnte erhvervsdykkerbeviser kan udstedes bevis som blandingsgasdykker.

Stk. 2. Bevis som blandingsgasdykker giver ret til at anvende blandingsgas som åndemiddel ved dykning med let eller tung dykkerudrustning, jfr. § 2.

Stk. 3. Ved blandingsgas som åndemiddel, hvori indgår andre luftarter end i ren atsmosfærisk luft eller samme luft-

slag, sum í vanligari luft, men í einum øðrum býti.

Stk. 4. Landsstýrið fyrisetir reglur um tær treytir, sum ein persónur skal lúka, út um tær í § 4. og 6. settu, fyri at fáa og varðveita bræv sum blandingskavari.

§ 4.

Til tess at fáa eitt av teimum í § 2. og 3. nevndu kavanabrøvum krevst, at viðkomandi:

1) hevur fylt 18 ár, men ikki 40 ár,
2) við nóg góðum úrsliti hevur givið seg undir læknakanning, sum fyrisett av landsstýrinum,
3) hevur tikið ta til bræv við svarandi kavararoynd á kavaraskúla, sum er góðkendur av landsstýrinum.

Stk. 2. Kavarabræv verður skrivað ókeypis av Arbeiðseftirlitinum.

§ 5.

Landsstýrið fyrisetir reglur um kavararoyndir.

Stk. 2. Til tær í § 4. stk. 1. nr. 3 nevndu kavararoyndir skal prógvast, at próvtakarin hevur nóg góðan kunnleika um:

1) kavaraástøði,
2) ta kavaraútgerð og vanliga nýtt hjálpartól, sum prógvið krevnir um,
3) kaving við útgerðini í verki,
4) øll vanlig tiltøk at tryggja kavaran í arbeðinum,
5) at skipa kavingina og
6) kavaralóggávuna.

arter som i atmosfærisk luft, men i et andet blandingsforhold.

Stk. 4. Landsstyret fastsætter regler om de betingelser, som en person skal opfylde ud over de i § 4. og 6. fastsatte for at erhverve og bevare bevis som blandingsgasdykker.

§ 4.

Til erhvervelse af et af de i § 2. og 3. nævnte erhvervsdykkerbeviser kræves, at vedkommende,

1) er fyldt 18 år, men ikke 40 år,
2) har gennemgået en af landsstyret fastsat lægeundersøgelse med tilfredsstillende resultat og
3) har bestået den til beviset svarende dykkerprøve ved en af landsstyret godkendt dykkerskole.

Stk. 2. Erhvervsdykkerbeviser udstedes gratis af arbejdstilsynet.

§ 5.

Landsstyret fastsætter regler om dykkerprøver.

Stk. 2. Til de i § 4. stk. 1. nr. 3 nævnte dykkerprøver skal det godtgøres, at den, der aflægger prøven, har fyldestgørende kendskab til:

1) dykkerteori,
2) det af beviset omfattede dykkermateriel, herunder almindeligt benyttet hjælpemateriel,
3) praktisk dykning med materiellet,
4) alle almindelige foranstaltninger til varetagelse af dykkerens sikkerhed under arbejdet,
5) tilrettelæggelse af dykningen og
6) dykkerlovgivningen.

§ 6.

Til tess at varðveita kavarabrævið, skal kavarin geva seg undir læknakanning, fyrisett av landsstýrinum, við nóg góðum úrsliti.

Stk. 2. Læknakanning skal verða fimta hvørt ár. Er kavari 40 ár, skal læknakanningin verða annað hvørt ár, og er kavari 60 ár, skal læknakanningin verða hvørt ár.

Stk. 3. Harumframt skal kavari árliga geva seg undir eina av landsstýrinum ásetta serliga kanning av lunguntum (røntgenkanning).

Stk. 4. Er úrslitið av teimum í stk. 1 og 3 nevndu kanningum nóg gott, váttar læknin hetta á kavarabrævinum. Viðvíkjandi kanningini, nevnd í stk. 1, skrivar læknin harumframt eina heilsuváttan, sum verður send Arbeiðseftirlitinum.

§ 6.

For at bevare gyldigheden af et erhvervsdykkerbevis skal dykkeren gennemgå en af landsstyret fastsat lægeundersøgelse med et tilfredsstillende resultat.

Stk. 2. Lægeundersøgelsen skal foretages hvert femte år. Er dykkeren fyldt 40 år, skal lægeundersøgelsen dog foretages hvert andet år, og er han fyldt 60 år, skal lægeundersøgelsen foretages hvert år.

Stk. 3. Dykkeren skal endvidere årligt med tilfredsstillende resultat gennemgå en af landsstyret fastsat særlig undersøgelse af lungerne (røntgenundersøgelse).

Stk. 4. Er resultatet af de i stk. 1 og 3 nævnte undersøgelser tilfredsstillende, attesterer lægen dette på erhvervsdykkerbeviset. For så vidt angår den i stk. 1 nævnte undersøgelse, udfærdiger lægen tillige en helbredsattest, der indsendes til arbejdstilsynet.

§ 7.

Um tær í § 4 og 6 nevndu læknakanningar geva orsøk til tva, um kavarin lýkur heilsutreytirnar, kann Arbeiðseftirlitið krevja, at fleiri kanningar verða gjørdar. Tað kann verða kravt, at kanningarnar verða gjørdar av stovni ella lækna við serligari løggilding.

Stk. 2. Fyri kavarar, sum hava verið fyri stigvísari dekompressión (trindekompressión), kann verða kravt, at teir longu leggirnir verða røntgenkannaðir.

Stk. 3. Eykakanningar eru ókeypis fyri kavaran.

§ 7.

Hvis de i § 4 og 6 nævnte lægeundersøgelser giver anledning til tvivl om, hvorvidt dykkeren opfylder helbredskravene, kan arbejdstilsynet forlange supplerende undersøgelser foretaget. Undersøgelserne kan kræves foretaget af særlige institutioner eller af læger med speciel autorisation.

Stk. 2. For dykkere, der har undergået trindekompression, kan der stilles krav om røntgenundersøgelse af de lange rørknogler.

Stk. 3. Supplerende undersøgelser er gratis for dykkeren.

§ 8.

Er kavarin 67 ár, ella lýkur hann ikki tey settu heilsukrøvini, fer kavarabrævið úr gildi og kann verða inndrigið av Arbeiðseftirlitinum. Sama er galdandi, um ein kavari noktar at geva seg undir læknakanning eftir § 6 og 7.

§ 9.

Landsstýrið fyrisetir reglur um kavaraútgerð og onnur kavaratól, herundir innrætting av hjálpartólum og útgerð v.m.

§ 10.

Øll kavaraútgerð, íroknað eykalutir, sum kemur í handilin her á landi, skal vera av góðkendum slagi.

Stk. 2. Arbeiðseftirlitið ásetir góðkenningarreglur og merkingarreglur.

Stk. 3. Trykkkamarsútbúnaður, sum verður nýttur í sambandi við kaving, skal vera góðkendur av Arbeiðseftirlitinum. Váttan um góðkenning skal vera sjónlig.

§ 11.

Kavaraútbúnaður og trykkamarsútbúnaður ella líknandi samansetingar av kavaratólum, sum verða nýtt í sambandi við vinnukavaraarbeiði, ella sum verður útleigað á føroyskum øki ella frá føroyskum skipi, skal vera undir eftirliti av Arbeiðseftirlitinum. Reglur um hetta verða gjørdar av landsstýrinum.

Stk. 2. Tað liggur á eigarunum av kavaraútbúnaði ella trykkkamarsútbúnaði v. m. at fráboða til Arbeiðseftirlitið,

§ 8.

Er dykkeren fyldt 67 år, eller opfylder han ikke de fastsatte helbredskrav, mister erhvervsdykkerbeviset sin gyldighed og kan inddrages af arbejdstilsynet. Det samme gælder, hvis en dykker nægter at gennemgå lægeundersøgelser i henhold til § 6 og 7.

§ 9.

Landsstyret fastsætter bestemmelser om dykkerudrustningers og andet dykkermateriels, herunder hjælpemateriels indretning og udstyr m.v.

§ 10.

Enhver dykkerudrustning, der bringes i handelen her i landet, herunder reservedele, skal være af godkendt type.

Stk. 2. Arbejdstilsynet fastsætter regler for typegodkendelsen, herunder nødvendig mærkning.

Stk. 3. Trykkammeranlæg, der bruges i forbindelse med dykning, skal være godkendt af arbejdstilsynet. Godkendelsen skal fremgå af opslag.

§ 11.

Dykkerudrustninger og trykkammeranlæg eller tilsvarende sammensætninger af dykkermateriel, der anvendes i forbindelse med erhvervsmæssigt dykkerarbejde, eller som udlejes på færøsk territorium eller fra færøsk skib, skal underkastes eftersyn af arbejdstilsynet. Regler herom fastsættes af landsstyret.

Stk. 2. Det påhviler ejere af dykkerudrustninger eller trykkammeranlæg m.v. at anmelde til arbejdstilsynet, hvor

hvar og nær nevndu sýnini skulu verða.

§ 12.

Tann kavari, sum brúkar kavaraútgerð, skal tryggja sær, at útgerðin er í lagi, hvørja ferð hon verður brúkt. Kavarin skal leiðbeina hjálparfólkum sínum um teirra skyldur, meðan kavaraarbeiðið fer fram.

§ 13.

Landsstýrið ger reglur um, at kavaraarbeiðið verður útint á tryggan hátt, um tryggleikan hjá kavarum og hjálparfólki í arbeiðinum, herundir starvsfólk í trykkkamarsútbúnaði, sum verður nýtt í samband við kaving.

Samstundis verður ásett, um reglurnar eru galdandi fyri útlendskar kavarar, sum arbeiða á føroyskum umráði.

Stk. 2. Landsstýrið ger reglur um kavaradagbók.

§ 14.

Arbeiðseftirlitið kann í serligum føri gera undantøk frá avgerðini í § 1 og 4 og í § 10 og 11.

Stk. 2. Arbeiðseftirlitið kann harumframt í serligum føri víkja frá tí í § 8 setta aldursmarki.

Stk. 3. Arbeiðseftirlitið kann í serligum førum geva loyvi til at kava á dýpi, sum er meira enn 50 m.

§ 15.

Landsstýrið kann heimilað Arbeiðseftirlitinum ella øðrum samsvarandi stovni undir landsstýrinum at fremja tær heim-

og hvornår de nævnte syn skal foretages.

§ 12.

Den dykker, der anvender en dykkerudrustning, skal sikre sig, at udrustningen er i orden, hver gang den tages i brug. Dykkeren skal instruere sine medhjælpere om deres pligter, medens dykkerarbejdet foregår.

§ 13.

Landsstyret fastsætter regler om dykkerarbejdets sikre udførelse, om betryggelse af dykkere og af hjælpepersonel under arbejdet, herunder af personel i trykkammeranlæg, der bruges i forbindelse med dykning.

Samtidig fastsættes, i hvilket omfang bestemmelserne finder anvendelse på udenlandske dykkere, der arbejder på færøsk territorium.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter regler om dykkerjournaler.

§ 14.

Arbejdstilsynet kan under særlige omstændigheder gøre undtagelser fra bestemmelserne i § 1 og 4 samt § 10 og 11.

Stk. 2. Arbejdstilsynet kan endvidere under særlige omstændigheder fravige den i § 8 anførte aldersgrænse.

Stk. 3. Arbejdstilsynet kan i enkelte tilfælde give tilladelse til at foretage dykninger på vanddybder på mere end 50 m.

§ 15.

Landsstyret kan bemyndige arbejdstilsynet eller anden tilsvarende institution under landsstyret til at udøve de beføj-

ildir, sum í hesi lóg eru latnar Føroya landsstýri.

Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um kæru og um, at kærumál ikki kann leggjast fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika.

elser, der i denne lov er tillagt landsstyret.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at klager ikke kan indbringes for højere administrativ myndighed.

§ 16.

Uttan so at hægri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður brot á § 1 og §§ 10-12 sektað við bót.

§ 16.

Medmindre højere straffer forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes overtrædelse af § 1 samt §§ 10-12 med bøde.

§ 17.

Tær í hesi lóg ásettu reglur eru eisini galdandi fyri persónar, sum hava fingið kavarabrævi eftir løgtingslóg nr. 54 frá 20. august 1970 um kavaravinnu. Aldursmarkið, sum er ásett í § 8, fær gildi frá 1. januar 1992.

Stk. 2. Tey kavarabrøv, sum latin eru eftir løgtingslóg nr. 54 frá 20. august 1970 um kavaravinnu, verða javnmett við kavarabrøvini í hesi lóg soleiðis:

1) Svimjikavarabrævi verður javnmett við brævi sum lættur kavari tó soleiðis, at dýpið, ið kavararoyndin á kavaraskúla fevnir um, verður váttað á brævið og hevur kavarin rætt at útinna arbeiði niður á hetta dýpi.
2) Kavarabrævi av 1. stigi verður javnmett við brævi sum tungur kavari.
3) Kavarabrævi av 2. stigi verður javnmett við brævi sum tungur kavari, men loyvir tó bert rætt til at gera kavaraarbeiði á dýpi inntil 12 m, ið verður váttað á brævið.

§ 17.

De i denne lov indeholdte bestemmelser finder tilsvarende anvendelse på personer, der har erhvervet dykkerbevis i henhold til lagtingslov nr. 54 af 20. august 1970 om dykkernæring. Lovens § 8 fastsatte aldersgrænse finder først anvendelse fra den 1. januar 1992.

Stk. 2. De i medfør af lagtingslov nr. 54 af 20. august 1970 om dykkernæring udstedte dykkerbeviser ligestilles med de i denne lov omhandlede beviser således:

1) Svømmedykkerbevis ligestilles med bevis som let dykker dog således, at dybden, som beviset på dykkerskolen omfatter, bliver påført beviset og har dykkeren ret til at udføre arbejde til nævnte dybde.
2) Dykkerbevis af 1. klasse ligestilles med bevis som tung dykker.
3) Dykkerbevis af 2. klasse ligestilles med bevis som tung dykker, men giver dog kun ret til at udføre dykkerarbejde på vanddybder indtil 12 m, som påføres beviset.

§ 18.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis verður løgtingslóg nr. 54 frá 20. august 1970 um kavaravinnu sett úr gildi.

§ 18.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Stk. 2. Samtidig ophæves lag-tingslov nr. 54 af 20. august 1970 om dykkernæring.

Viðmerkingar

Tann 15. november 1990 samtykti landsstýrið við heimild í løgtingslóg nr. 54 frá 20. august 1970 um kavaravinnu at seta í gildi reglur um kavaraútgerð, um tryggleikan og um læknakanning hjá kavarum. Samstundis varð avgjørt at fara undir, at fyrireika uppskot um nýggja løgtingslóg um kavaravinnu.

Arbeiðseftirlitið, Vaktar- og Bjargingartænastan, Deildin fyri arbeiðis- og almannaheilsu og Deildin fyri fiski- og aðrari vinnu hava í samráð við umboð fyri Føroya Kavaraskúla (Heri Mørkøre) gjørt uppskot um nýggja løgtingslóg um kavaravinnu. Arbeiðið er framhald av fyrireikingunum av kunngerð nr. 138 frá 3. december 1990 um kavaraútgerð.

Kavaravinnan í Føroyum hevur fingið eitt broytt vinnumynstur, sum serliga innan alivinnuna ger, at tað kann gerast neyðugt, at kava niður um 25 m og krevst tá, at dekompressión- og viðgerðarútgerð er tøk í landinum fyri kavarar. Vaktar- og Bjargingartænastan hevur nú hesa útgerð tøka.

Við heimild í lógini eigur landsstýrið at áseta nærri reglur um kavaraútbúgving fyri vinnukavarar. Vaktar- og Bjargingartænastan hevur útgerð og serútbúnan instruktør, sum er førur fyri at átaka sær útbúgvingina av vinnukavarum. Føroya Kavaraskúli verður soleiðis niðurlagdur.

Eftirlitið við kavaraútgerð og vinnubrøvum hjá kavarum verður lagt til Arbeiðseftirlitið at umsita.

Í mun til løgtingslóg nr. 54 frá 20. august er soleiðis talan um, at nýggja lógin er ein endurskoðan við teimum broytingum, sum eru nevndar í hesum viðmerkingum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 48/1991: Løgtingslóg um kavaravinnu.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 5. december 1991 og undir 1. viðgerð 11. december 1991 beint í Mentannar- og Skúlanevndina.

Føroya Kavaraskúli hevur boðað nevndini frá, at um ikki ein útbúgving til minni dýpi enn 50 m verður, fáa kavarar, sum ikki hava fingið neyðuga upplær-

ing og kravt vinnubrøv minni arbeiði at gera, eitt nú at skera av, tá okkurt kemur um skrúvuna á skipum.

Eitt kavaraskeið, sum gevur rætt at útinna arbeiði niður á 50 m dýpi, kemur at verða kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi, og verða tað neyvan allir, sum eru áhugaðir fyri kaving, sum koma at hava møguleika, bæði fíggjarliga og hava tíð at fara á eitt tílíkt skeið.

Samsvarandi omanfyristandandi setir nevndin fram hesum viðvíkjandi soljóðandi:

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Sum nýtt pkt. 3 til § 2, stk. 1 verður sett:

" 3) Kavarabrøv sum lættur kavari, sum gevur rætt at útinna arbeiði sum kavari niður á 12 m dýpi við lættari kavaraútgerð og við vanligari lofti sum andingarevni jbr. stk. 3."

Som nyt pkt. 3 til § 2, stk. 1 tilføjes:

"3) Dykkerbevis som let dykker, der giver ret til at udføre arbejde på vanddybder indtil 12 m med let dykkerudrustning og med almindelig atmosfærisk luft som åndemiddel, jfr. stk. 3."

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

49. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásettar grannskoðarar

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásettar grannskoðarar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 21. mai 1980 um skrásettar grannskoðarar verður gjørd henda broyting:

§ 15, stk. 2 verður broytt til:

"Grannskoðarar hava til 1. januar 1993 rætt til at verða upptiknir í skrásetingina av grannskoðarum, um teir lúka krøvini í § 1, stk. 2, nr. 1) - 5), samanber stk. 3, og í minsta lagi í 10 ár hava havt sjálvstøðugt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om registrerede revisorer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 65 af 21. maj 1980 om registrerede revisorer foretages følgende ændring:

§ 15, stk. 2 ændres til:

"Revisorer har indtil 1. januar 1993 ret til at blive registreret, når de opfylder betingelserne i § 1, stk. 2, nr. 1) - 5), jfr. stk. 3, og i mindst 10 år har udøvet selvstændigt revisorhverv som hovederhverv."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Eftir § 1, stk. 2 í galdandi løgtingslóg skal persónur, fyri at kunna verða skrásettur sum grannskoðari,

1) hava heimarætt í ríkinum,
2) búgva í Føroyum,
3) hava fylt 25 ár,
4) ikki vera gjørdur ómyndugur, vera undir verju ella hava búgv sítt til trotaviðgerð,
5) hava staðið prógtøkur ella royndir, sum landsstýrið hevur góðkent til hetta endamál, og

6) í minsta lagi 3 ár aftan á at hava fylt 18 ár hava útint alt vanligt bókhalds-, roknskapar- og grannskoðaraarbeiði hjá einum statsgóðkendum ella skrásettum grannskoðara.

Landsstýrið kann víkja frá krøvunum í stk. 2, nr. 1.

Í Suðuroy er ongin statsgóðkendur ella skrásettur grannskoðari, soleiðis at møguleiki er ikki hjá persónum, sum annars lúka treytirnar nr. 1) - 5), at verða skrásettir uttan at flyta av oynni og í 3 ár arbeiða hjá einum statsgóðkendum ella skrásettum grannskoðara í t.d. høvuðsstaðarøkinum.

Eftir uppskotinum verður kravið um at hava arbeitt í 3 ár hjá statsgóðkendum ella skrásettum grannskoðara slept, um persónurin í staðin hevur havt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki í minsta lagi í 10 ár.

Landsstýrið heldur tað ikki vera ráðiligt at gera eina skipan, har tað framhaldandi verður gjørt undantak til pkt. 6, serliga tá hugsað verður um, at donsku reglurnar fyri skráseting av grannskoðarum ætlandi verða gjørdar nógv strangari. Tað verður tí skotið upp, at skipanin bert skal vera galdandi til 1. januar 1993. Tá skuldi trupulleikin í Suðuroy eisini vónandi verið loystur.

50. Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 4, stk. 2 verða "9 limir" broytt til: "11 limir".
2) Í § 4, stk. 2, litra c) verða í báðum førum "4 limir" broytt til: "6 limir".
3) § 4, stk. 3, litra b) verður orðað soleiðis:

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om Landsbanki Føroya.

§ 1.

I lagtingslov nr. 57 af 2. oktober 1978 om Landsbanki Føroya med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 4, stk. 2 ændres "9 medlemmer" til: "11 medlemmer."
2) I § 4, stk. 2, litra c) ændres i begge tilfælde "4 medlemmer" til: "6 medlemmer."
3) § 4, stk. 3, litra b) affattes således:
"3 medlemmer valgt af tilsyns-

"3 limir valdir av umsjónarráðnum við vanligum meiriluta."

4) § 6 verður orðað soleiðis:

"Bankin er bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu nýta bankan sum bankasamband."

5) § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Bankin kann taka ímóti innskotum frá landskassanum, føroyskum peningastovnum og landsstovnum."

6) § 7, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"Bankin kann taka ímóti innskotum frá fíggjarstovnum uttan fyri Føroyar umframt frá Danmarks Nationalbank og statsligum stovnum."

7) § 7, stk. 3 verður strikað.

8) § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Bankin kann standa fyri landskassans útlánum og veðhaldum sambært serstakari lóggávu."

9) § 11, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Bankin kann veita lán til landskassan, landsstovnar og privatar peningastovnar í Føroyum."

10) § 11, stk. 2 verður strikað.

11) § 11, stk. 3 verður strikað.

rådet med almindelig stemmeflerhed."

4) § 6 affattes således:

"Banken fungerer som landkassens bankforbindelse. Landsinstitutioner kan benytte banken som bankforbindelse."

5) § 7, stk. 1 affattes således:

"Banken kan modtage indskud fra færøske pengeinstitutter og landskassen."

6) § 7, stk. 2 affattes således:

"Banken kan modtage indskud fra finansielle institutioner uden for Færøerne samt fra Danmarks Nationalbank og statslige institutioner."

7) § 7, stk. 3 udgår.

8) § 10, stk. 1 affattes således:

"Banken kan forestå landskassens udlån og garantier i henhold til særlig lovgivning."

9) § 11, stk. 1 affattes således:

"Banken kan låne ud til landskassen, landsinstitutioner og private pengeinstitutter på Færøerne."

10) § 11, stk. 2 udgår.

11) § 11, stk. 3 udgår.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Við hesum verður uppskot til broytingar í løgtingslóg nr. 57 frá 29. september 1978 um Landsbanka Føroya framlagt.

Sum nevnt varð lógin um Landsbankan samtykt og lýst í 1978, men ikki fyrrenn í 1987 fór bankin so smátt at virka. Tá varð nýggj nevnd vald og stjóri settur.

Síðani tá hevur Landsbankin mest virkað sum ráðgevi landsstýrisins í búskaparligum spurningum, útvegað uttanlandslán til landskassan og umsitið veðhald landskassans.

Seinastu tíðina hevur verið arbeitt dúgliga við at fáa Landsbankan at virka eftir síni ætlan. Hetta virksemið hevur verið bæði á politiskum støði og hjá bankanum sjálvum.

Ein treyt fyri at fáa gongd á virksemi bankans hevur verið, at nakrar broytingar verða gjørdar í 1978-lógini. Nevnd Landsbankans hevur gjørt uppskot til broytingar í lógini og í áliti frá nevndini verður sagt, at lógarbroytingarnar ganga sjónarmiðum, sum privatu peningastovnarnir hava borið fram, á møti, og at hetta verður gjørt fyri at fremja eitt gott samstarv við peningastovnarnar.

Endamálið við broytingunum er, at bankavirki Landsbankans verður sentralt bankavirksemi. T.v.s. at Landsbankin verður bankasamband við landskassan og stovnar, sum eru beinleiðis knýttir at landskassanum. Hann skal umsita landskassans peningaognir, hann skal kanna landskassans og landsins gjaldføri, og hann skal í ávísan mun hava myndugleika til at regulera landsins gjaldføri.

Tá tð talan er um landsstovnar, sum eru beinleiðis knýttir at landskassanum, verður meint við, at hesir nú eru partar av landskassanum.

Landið er lítið og kemur ofta út fyri stórum konjunkturumskiftingum. Landsbankans styrki er, at hann er óheftur av serálugamálum, tað verið seg politiskum ella vinnuligum, at aðalmálið er at laga landsins gjaldføri eftir búskaparligum tørvi, og at hann tí kann byggja sítt virksemi á eitt fakligt búskaparligt støði.

Á hesum støði kann Landsbankin gerast ein miðdepil, sum øðrumegin samstarvar við peningastovnar og hinumegin við landsstýrið.

Tær peningaupphæddir, sum landskassin ræður yvir í dag, muna í sær sjálvum ikki nógv til at laga landsins gjaldføri, til tann búskaparliga tørvin. Tí verður umhugsað at økja um tann pening, sum Landsbankin kann ráða yvir soleiðis, at hann kann gerast ein náttúrligur samstarvspartnari á tí føroyska kredittmarknaðinum.

Í hesum sambandi hava samráðingar verið við privatar føroyskar peningastovnar og semja er fingin í lag við hesar um plasering av peningi, sum Landsbankin ræður yvir. Eisini er gjørt uppskot til sáttmála um samstarv og samsýning millum Landsbankan og landsstýrið. Í hesum sambandi verður lógaruppskot lagt fyri løgtingið.

Landsstýrið hevur gjørt viðtøkur fyri Landsbankan. Tá ið hesar framløgdu lógarbroytingar eru samtyktar, verða neyðturviligar broytingar í viðtøkunum eisini gjørdar í samráð við nevnd, stjórn og umsjónarráð Landsbankans.

Felagsálit

Í

Løgtingsmáli nr. 50/1991: Broyting í løgtingslóg um landsbanka Føroya og løgtingsmál nr. 51/1991: Løgtingslóg um innlán í landsbankan og lán úr landsbankanum.

Málini vórðu framløgd av landsstýrinum tann 5. desember 1991. Bæði málini fingu 1. viðgerð saman tann 15. desember 1991 og eftir hesa viðgerð beind í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málini og roynt hevur verið at fáa málini so væl lýst sum gjørligt.

Landsbankastjórin hevur verið á fundi við fíggjarnevndina fyri at greiða frá málinum og svara spurningum fyri at fáa málini so væl lýst fyri nevndini sum til ber.

Í løgtingsmáli nr. 50/1991: Broyting í løgtingslóg um landsbanka Føroya verða gjørdar fleiri broytingar í upprunalógini um Landsbanka Føroya.

Landsbanki Føroya hevur, sum nevnt er í viðmerkingunum, ikki virkað stór vegis, síðan lógin um Landsbanka Føroya varð samtykt og lýst í 1978.

Síðani 1987 hevur landsbankin mest virkað sum ráðgevi hjá landsstýrinum í búskaparspurningum, útvegað uttanlandslán til landskassan og umsitið veðhald landskassans.

Í samgonguskjalinum verður sagt undir (búskaparmálum) landsbankin: Lógin verður endurskoðað.

Hetta verður nú gjørt við teimum broytingum, ið skotnar eru upp í hesi lóg.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) skilir støðuna soleiðis, at samráðingar hava verið við peningastovnarnar eins og politisku myndugleikarnar í Tinganesi, og at broytingarnar eru gjørdar av stjórn og nevnd landsbankans.

Landsstýrið sigur, at seinastu tíðina hevur verið arbeitt dúgliga við at fáa landsbankan at virka eftir ætlan. Hetta virksemið hevur verið bæði á politiskum støði og hjá bankanum sjálvum.

Eisini verður sagt í viðmerkingunum, at ein treyt fyri virksemi bankans hevur verið, at nakrar broytingar verða gjørdar í 1978 lógini.

Nevnd landsbankans hevur viðgjørt uppskot til broytingar í lógini og í áliti frá nevndini verður sagt, at lógarbroytingarnar ganga sjónarmiðum, sum privatu peningastovnarnir hava borið fram, á møti, og at hetta verður gjørt fyri at fremja eitt gott samstarv við peningastovnarnar.

Endamálið við landsbankanum er, at fáa eina betur javnvág í búskaparligu menningina í Føroyum. At samstarvið millum landsstýrið, peningastovnar, landsins myndugleikar og privat vinnurekandi verður best møguligt, bæði tá ræður um íløgur og rakstur. Landsbankin kann ikki reka bankavirksemi í kapping við hinar peningastovnarnar - tvørturímóti - landsbankin hevur skyldu til at skipa so fyri, at kappingarføríð og konsolideringin bert kann gerast betur, mett út frá einum altjóða støði.

Tær vanligu uppgávurnar hjá einum tjóðbanka eru hesar:

1) framleiðsla av pengaseðlum
2) framleiðsla av myntum
3) bankanna banki
4) bankasamband hjá tí almenna

ad 1) og 2): Við tað at peningaskipan okkara er ríkismál, og við tað at tann føroyska krónan er í pariteti við donsku krónuna, so koma uppgávur undir 1) og 2) fyribils ikki upp á tal. Danski tjóðbankin framleiðir serligar føroyskar pengaseðlar.

ad 3) Danski tjóðbankin virkar í dag sum banki bankanna. Hetta heldur fram óbroytt. Bankunum eru eisini tryggjaðar óbroyttar heimildir at taka uttanlandslán eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum smb. ríkislóg.

Landsstýrinum er álagt sambært § 1 í løgtingsmáli nr. 51/91: Løgtingslóg um innlán í Landsbankan og lán úr Landsbankanum, at hava innlán í landsbankanum, sum svarar til í minsta lagi 15% av bruttotjóðarúrtøkuni. Hesin peningur kann eftir ávísum reglum verða lentur út til landskassan, tó í mesta lagi hert helvtin av teimum 15%.

Semja er fingin í lag millum føroysku peningastovnarnar og landsbankan um nýtslu av yvirskotslikviditeti landsbankans soleiðis, at hesin eisini í ávísan mun kemur at virka sum banki bankanna.

ad 4): Sum bankasamband hjá landskassanum og stovnum, sum eru beinleiðis knýttir at landskassanum, hevur landsbankin umframt umsiting og samskipan av landsins gjaldføri samb.

3) eisini hesar høvuðsuppgávur:
   - umsiting av landsins peningaognum, bæði teimum, sum sambært nýggju skipanini eru innbygdar í fíggjarlógina og teimum, sum skulu umsitast fígjøgnum grunnar,
   - umsiting av landskassans útlánum og garantium,
   - ábyrgd av øllum lántøkum hjá tí almenna,

– samskipan av øllum lántøkum til grunnar, feløg v.m., sum tað almenna hevur ábyrgd av – froknað kommunur – við almennum lántøkum annars.
– kanning av og rapporteringar um búskaparstøðu landsins.

Við tað, at danska lógin um "kreditformidling" ikki er galdandi fyri Føroyar, og síðani eingin føroysk lóg er um hetta, er tað avmarkað, hvøjrar møguleikar landsbankin hevur fyri fíggjarstýring í samfelagnum. her verður hugsað um inn- og útlánsloft, rentustøði v.m. Peningavinnan er vorðin ein frían vinna, har marknaðarbúskapurin ræður. Hetta verður óivað meira galdandi í framtíðini, soleiðis sum samfelagsmenningin fer fram.

Samsvarandi frammanfyristandandi viðmerkinum tekur meirilutin undir við uppskoti landsstýrisins, men til § 13 verður sett fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Sum pkt. 12 verður skoyt uppí uppskot landsstýrisins:	*Som pkt. 12 tilføjes til landsstyrets forslag:*
"**12)** Sum nýggj § 13 verður sett:	"12) Som ny § 13 tilføjes:
"Bankin skal ráðgeva almennum myndugleikum og stovnum í samband við lántøku uttanfyri Føroyar.	"Banken skal rådgive offentlige myndigheder og institutioner i forbindelse med optagelse af lån udenfor Færøerne.
2. stk. Bankin skal samskipa allar almennar lántøkur uttanlands, froknað lántøkum hjá kommunum.""	**Stk. 2.** Banken skal koordinere alle offentlige udenlands lånoptagelser, heri beregnet kommunernes lånoptagelser.""

Í løglingsmáli nr. 51/1991: Um innlán í landsbankan og lán úr landskassanum verður sagt í viðmerkingunum, at ætlanin við hesum lógaruppskotið er, at tað skapar fortreytir fyri, at landsbankin kann reka nakrar tjóðbanka uppgávur.

Uppskotið hevur samband við tær "prinsippiellu" broytingar sum í hesum tíðum verða gjørdar í fíggjarlógini og í landskassans roknskapi. Eisini hevur tað samband við uppskotið um at gera broytingar í landsbankalógini.

Nevndi meiriluti vísir annars til viðmerkingar landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 51/1991 har nágreiniliga verður sagt frá lánitreytum og virksemi landsbankans annars.

Sami meiriluti er samdur um, at tíðin má verða komin til, at landsbankin nú byrjar sítt virksemi og at hetta verður gjørt í samljóð við tær grundleggjandi

broytingar sum í hesum tíðum verða gjørdar í fíggjarlógini og landskassaroknskapinum.

Við hesi broyting mælir meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) til at samtykkja uppskotini nr. 50/1991: Broyting í løgtingslóg um landsbankan og nr. 51/1991: Løgtingslóg um innlán í landsbankanum og lán úr landsbankanum.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) vísir á, at tað í samband við komandi búskapartiltøk fyrst og fremst skal sparast í tí almennu fyrisitingini. Hví skulu vaskikonur fyrst verða fyri skotum, tá munadyggar sparingar eins væl kunnu byrja í erva í organisatiónunum? Við hesum viðmerkingum setir minnilutin (Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður Føroya Landsstýri, at leggja uppskot fram fyri Føroya løgting um at leggja Landsbankan niður og flyta virksemi bankans, burtursæð frá lántøkum, til aðrar almennar stovnar. Møguligar lántøkur í framtíðini skulu bjóðast út til privata peningamarknaðin.

51. Løgtingslóg um innlán í Landsbankan og lán úr Landsbankanum

Uppskot

til

Løgtingslóg um innlán í Landsbankan og lán úr Landsbankanum.

§ 1.

Landsstýrinum verður álagt landskassans vegna at hava innlán í Landsbankanum, sum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári.

Lagtingslov om Landsbankens ind- og udlån.

§ 1.

Det pålægges landsstyret på landskassens vegne at have indlån i Landsbanken, der mindst svarer til 15% af bruttonationalproduktet i det foregående år.

Stk. 2. Í august ásetir Landsbankin minstuupphæddina fyri komandi ár út frá seinast kunngjørdu tjóðarroknskapsuppgerð.

§ 2.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán úr Landsbankanum, sum svarar til helvtina av minstuupphæddini í innlánum.

Stk. 2. Landskassans meðallántøka pr. dag í einum 12 mánaða skeiði skal tó ikki fara uppum fjórðingin av minstuupphæddini í innlánum.

Stk. 3. Hendan lántøkuheimildin kemur aftrat teimum lántøkuheimildum, sum løgtingið annars samtykkir.

Stk. 4. Um landskassans innlán í Landsbankan eru størri enn minstaupphæddin, kann landskassin við heimild í vanligum lántøkulógum læna av meirinnláninum við einum øðrum parti enn av minstuupphæddini. Landsbankin ásetir, hvussu nógv í teimum førum, tá parturin ikki er lógarfestur.

§ 3.

Landsbankin umsitur peningin í samsvari við landsbankalógina.

Stk. 2. Landsbankin ásetir rentu fyri innlán og útlán av hesum peningi. Landsbankin kann ikki átaka sær rentutap av hesum peningi.

Stk. 3. Til tess at lætta um fyrisitingina, ásetir Landsbankin treytir fyri og hvørjar konto, landskassin og landsstovnar kunnu hava í peningastovnum

Stk. 2. I august fastsætter Landsbanken minimumsbeløbet for det kommende år ud fra den senest bekendtgjorte nationalregnskabsopgørelse.

§ 2.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån i Landsbanken, svarende til halvdelen af mindstebeløbet af indlån.

Stk. 2. Landskassens gennemsnitlige optagelse af lån pr. dag i en 12 måneders periode skal dog ikke overstige en fjerdedel af mindstebeløbet af indlån.

Stk. 3. Denne bemyndigelse til optagelse af lån kommer i tillæg til de bemyndigelser til optagelse af lån, som lagtinget iøvrigt vedtager.

Stk. 4. Såfremt landskassens indlån i Landsbanken er større end mindstebeløbet, kan landskassen med bemyndigelse i almindelige love om optagelse af lån, låne af merindlånet med en anden del end af mindstebeløbet. I de tilfælde, hvor lovbestemmelse ikke foreligger, fastsætter Landsbanken størrelsen af lånet.

§ 3.

Landsbanken administrerer midlerne i overensstemmelse med landsbankeloven.

Stk. 2. Landsbanken fastsætter rente af indlån og udlån af disse midler. Landsbanken kan ikke påtage sig rentetab af disse midler.

Stk. 3. Til forenkling af administrationen fastsætter Landsbanken betingelser for og hvilke konti landskassen og landsinstitutioner kan have i penge-

og postgiro til inngjaldingar og útgjaldingar.

Tillagingarreglur

§ 4.

Tann pening, sum landskassin og landskassans grunnar eiga innistandandi í peningastovnum í Føroyum og uttanlands, tá lógin fær gildi, verða settir sum innlán í Landsbankanum, meðan Landsbankin yvirtekur allar innlánskonti í peningastovnunum.

Stk. 2. Fyri tann pening, sum landskassin yvirtekur í hvørjum einstøkum peningastovni, verður sett ein tillagingartíð upp á 5 ár, har 1/5 av tí yvirtiknu upphæddini verður frígjørdur um árið.

Peningur, sum er bundin í tillagingartíðini, skal hava somu treytir, sum frammanundan, tó skal rentan í minsta lagi svara til innlán við 12 mánaða uppsøgn.

Frígjørdur peningur verður umsitin, sum ásett í § 3.

Stk. 3. Har landskassin hevur átikið sær skyldir mótvegis einstøkum peningastovni um innlán í sambandi við veðhald og upphøgging av skipum, kann bundin peningur, smb. stk. 2, ikki frígerast niðurum samanlagdar **a)** saldi fyri falnar borgskyldur hjá landskassanum, *b)* saldi fyri lán til landskassan, veitt til rindan av falnum borgskyldum landskassans og *c)* saldi fyri lán til landskassan, veitt í sambandi við upphøgging av fiskiskipum.

§ 5.

Í 2 ár frá tí at lógin fær gildi, fær landsstýrið heimild til at taka lán úr Lands-

institutter og postgiro til ind- og udbetalinger.

Tilpasningsregler

§ 4.

De midler, som landskassen og landskassens fonde har placeret på Færøerne og i udlandet ved lovens ikrafttræden, sættes som indlån i Landsbanken, medens Landsbanken overtager alle indlånskonti i pengeinstitutterne.

Stk. 2. For de midler, som Landsbanken overtager i hvert enkelt pengeinstitut, sættes en tilpasningstid på 5 år, hvor 1/5 af det overtagne beløb frigives om året.

Midler, der er bundet i tilpasningstiden, skal have de samme betingelser, som tidligere, dog skal renten mindst svare til indlån med 12 måneders opsigelse. Frigivne midler administreres, som fastsat i § 3.

Stk. 3. I de tilfælde, hvor landskassen har påtaget sig forpligtelser overfor et enkelt pengeinstitut om indlån i forbindelse med kaution og kondemnering af skibe, kan bundne midler, jfr. stk. 2, ikke frigives under sammenlagt *a)* saldi for landskassens faldne kautionsforpligtelser, *b)* saldi for lån til landskassen, givet til betaling af landskassens faldne kautionsforpligtelser og *c)* saldi for lån til landskassen, givet i forbindelse med kondemnering af fiskeskibe.

§ 5.

I 2 år fra lovens ikrafttræden får landsstyret bemyndigelse til at optage lån i

og postgíro til inngjaldingar og útgjaldingar.

Tillagingarreglur

§ 4.

Tann pening, sum landskassin og landskassans grunnar eiga innistandandi í peningastovnum í Føroyum og uttanlands, tí lógin fær gildi, verða settir sum innlán í Landsbankanum, meðan Landsbankin yvirtekur allar innlánskonti í peningastovnunum.

Stk. 2. Fyri tann pening, sum landskassin yvirtekur í hvørjum einstøkum peningastovni, verður sett ein tillagingartíð upp á 5 ár, har 1/5 av tí yvirtiknu upphæddini verður frígjørdur um árið.

Peningur, sum er bundin í tillagingartíðini, skal hava somu treytir, sum frammanundan, tó skal rentan í minsta lagi svara til innlán við 12 mánaða uppsøgn.

Frígjørdur peningur verður umsitin, sum ásett í § 3.

Stk. 3. Har landskassin hevur átikið sær skyldir mótvegis einstøkum peningastovni um innlán í sambandi við veðhald og upphøgging av skipum, kann bundin peningur, smb. stk. 2, ikki frígerast niðurum samanlagdar a) saldi fyri falnar borgskyldur hjá landskassanum, *b)* saldi fyri lán til landskassan, veitt til rindan av falnum borgskyldum landskassans og *c)* saldi fyri lán til landskassan, veitt í sambandi við upphøgging av fiskiskipum.

§ 5.

Í 2 ár frá tí at lógin fær gildi, fær landsstýrið heimild til at taka lán úr Lands-

institutter og postgiro til ind- og udbetalinger.

Tilpasningsregler

§ 4.

De midler, som landskassen og landskassens fonde har placeret på Færøerne og i udlandet ved lovens ikrafttræden, sættes som indlån i Landsbanken, medens Landsbanken overtager alle indlånskonti i pengeinstitutterne.

Stk. 2. For de midler, som Landsbanken overtager i hvert enkelt pengeinstitut, sættes en tilpasningstid på 5 år, hvor 1/5 af det overtagne beløb frigives om året.

Midler, der er bundet i tilpasningstiden, skal have de samme betingelser, som tidligere, dog skal renten mindst svare til indlån med 12 måneders opsigelse. Frigivne midler administreres, som fastsat i § 3.

Stk. 3. I de tilfælde, hvor landskassen har påtaget sig forpligtelser overfor et enkelt pengeinstitut om indlån i forbindelse med kaution og kondemnering af skibe, kan bundne midler, jfr. stk. 2, ikke frigives under sammenlagt *a)* saldi for landskassens faldne kautionsforpligtelser, *b)* saldi for lån til landskassen, givet til betaling af landskassens faldne kautionsforpligtelser og *c)* saldi for lån til landskassen, givet i forbindelse med kondemnering af fiskeskibe.

§ 5.

I 2 år fra lovens ikrafttræden får landsstyret bemyndigelse til at optage lån i

bankanum svarandi tíl munin millum innlánið í Landsbankan, sambært § 4, og minstainnlánið, sambært § 1 í hesi lóg.

Landsbanken svarende til differencen mellem indlånet i Landsbanken, jfr. § 4, og minimumsindlånet, jfr. § 1 i denne lov.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Ætlanin við hesum lógaruppskoti er at skapa fortreytir fyri, at Landsbankin kann reka nakrar tjóðbankauppgávur.

Uppskotið hevur samband við tær prinsipiellu broytingar, sum í hesum tíðum verða gjørdar í liggjarlógini og í landskassans roknskapi. Eisini hevur tað samband við uppskotið um at gera broytingar í landsbankalógini.

Ein av fortreytunum fyri virksemi Landsbankans, tá lógin varð samtykt í 1978 var, at bankin skuldi umsita tann pening, sum varð játtaður í landskassans grunnar og sum enn ikki varð brúktur til sítt endamál. Hesin peningur skuldi umsitast, men eisini brúkast í røktini av landskassans og landsins gjaldføri.

Grunnar landskassans, burtursæð frá nøkrum heilt fáum, verða nú avtiknir soleiðis, at tað ikki longur verður játtað í grunnar tíl seinni brúk. Ein av teimum týðandi fortreytunum fyri virksemi Landsbankans er sostatt tikin burtur. Skal Landsbankin fáa sína konstruktiva pengapolitiska funktión, er tað ein fortreyt, at hann ræður yvir gjaldføri, sum hann kann plasera, við atliti til tørvin hjá samfelagnum sum heild, herundir eisini hjá landskassanum og peningastovnunum.

Tí verður skotið upp, at løgtingið áleggur landskassanum at hava eina minstuupphædd innistandandi í Landsbankanum. Bruttotjóðarúrtøkan er eitt mát fyri virksemið og príslagið í landinum. Hesi viðurskifti eru millum tey avgerandi fyri, hvussu nógvum tiltaksgjaldføri, tørvur er á, tí verður minstainnlánið knýtt at bruttotjóðarúrtøkuni.

Tann seinasta tjóðarroknskaparuppgerðin er fyri 1988, tá varð BTÚ uppgjørd til 6.400 mió. kr. Mett eftir gongdini í lønarútgjaldingunum verður BTÚ fyri 1991 heldur minni enn fyri 1988, tí kann ætlast at minstainnlánið, sum skal verða 15% av BTÚ, fer at verða einar 900 mió. kr. Henda upphæddin minnir nakað um tær samlaðu brúksheimildirnar á grunnum landskassans, t.v.s. bæði tað, sum stendur í peningastovnum, og tað, sum er í landskassans likviditeti.

Fyri tað, at hetta gjaldføri skal koma øllum samfelagnum til góða, t.v.s. bæði landskassanum og peningastovnum, verður mælt til, at landskassin kann læna ein part av upphæddini, meðan restin verður tøk til privata búskapin.

Treytirnar hjá landskassanum at læna í Landsbankanum, verða í hesum uppskotinum munandi strangari enn í øðrum londum. Í strongum londum, sum t.d. Danmark og Týskalandi, kann staturin læna líka nógv, sum hann eigur í tjóðbankanum. Grundirnar fyri hesum fráviki í Føroyum eru í høvuðsheitum tvær. Onnur er, at her er eingin lánsbrævamarknaður í Føroyum, tí má tað tøka gjaldførið vera ríkiligt. Hin er, at tað samlaða gjaldførið í landinum skiftir nógv, av tí at landið er lítið og hevur eintáttaðan búskap.

Ein tillagingartíð er skotin upp. Landsstýrið fær 2 ár til at útvega tann pening, sum skal setast sum innlán í landsbankan. Peningastovnarnir fáa eina avdráttarskipan upp á 5 ár fyri tey innlán, sum landsstýrið hevur í stovnunum. Hetta er fyri ikki at skapa óneyðugar órógv og fyri at partarnir kunnu byggja upp eitt munagott samstarv, sum gevur eitt betri samanlagt innlit í landsins gjaldførisgongd.

52. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændringer:

1) § 8, verður orðað soleiðis:
"Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 2, Stk. 1 a), b), h), i) og j), sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, og sum í inntøkuárinum bert hava A-inntøku, ásettur til 42% av bruttoinntøkuni. Skatt-

1) § 8, affattes således:
"Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer, udskrives skatten til dem, der er omhandlede i § 2, stk. 1 a), b), h), i) og j), under begrænset skattepligt, og som i indkomståret kun har haft A-indtægt, med 42% af bruttoindtægten. Skat-

urin verður býttur við 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ten fordeles med 40% som kommuneskat og 60% som landsskat."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Broytingin er ein fylgja av, at § 2 í skattalógini verður broytt við, at litra j) verður sett aftur at.

53. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 fra 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:

1) Í § 2 verður sum nýtt litra j) sett:
"hava inntøku av slíkum slag, sum í § 60, stk. 1, nr. 1 umrøtt, og sum stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett við heimstaði í Føroyum. Skip, sum eru skrásett við heimstaði í Danmark, Grønlandi ella øðrum landi, verða javnmett við skip, sum eru skrásett við heimstaði í Føroyum, um tey við ongari manning verða leigað av føroyskum reiðaravirki til ferðafólka- og/ella farmaflutning. Skip, skrásett við heimstaði í Føroyum, sum við ongari

1) I § 2 indsættes som nyt litra j):
"oppebæres indkomst af den i § 60, stk. 1, nr. 1 nævnte art for arbejde, udført ombord på skib registreret med hjemsted på Færøerne. Med skib, registreret med hjemsted i Danmark, Grønland eller andet land, sidestilles skib, der er registreret med hjemsted på Færøerne, såfremt det uden besætning overtages på lejebasis af færøsk rederi til befragtning og/eller persontransport. Skib, registreret med hjemsted på Færøerne, som uden

manning verða leigað til reiðaravirki í Danmark, Grønlandi ella øðrum landi til ferðafólka- og/ ella farmaflutning, verður ikki mett sum skip, skrásett við heimstaði í Føroyum.

2) Sum nýggj § 63 a verður sett:
"Av tí løn, frítíðarløn, samsýning v.m., jbr. § 60, ið ein persónur, búfastur í Føroyum, ella eitt partafelag, fognarfelag, partsreiðarí, annar felagsskapur ella felag, skrásett í Føroyum og har veruliga leiðslan hevur høvuðssæti í Føroyum, rindar fyri tænastu umborð á skipi, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS, verður borið reiðaravirkinum aftur, so sum ásett í hesi grein.

Stk. 2. Einaferð um mánaðin ger Líkningarráð Føroya upp útgjaldingarnar hjá tí einstaka reiðaravirkinum, sum tað hevur goldið gjøgnum afturhaldsskipanina farna mánað fyri tænastu umborð á skipi, skrásett í FAS, og sum kemur undir ásetingarnar í stk. 1. Føroya Gjaldstova flytir síðani síðst í mánaðinum tað ásetta prosentið av útgjaldingunum reiðaravirkinum aftur.

Stk. 3. Árliga afturberingin eftir stk. 1 verður roknað eftir miðalskattaprosentinum undanfarna inntøkuár hjá teimum løntakarum, ið sama inntøkuár fingu inntøku um-

besætning overtages på lejebasis af rederi i Danmark, Grønland eller andet land til befragtning og/ eller persontransport, anses ikke for et skib, registreret på Færøerne.

2) Som ny § 63 a indsættes:
"Af den løn, feripenge, vederlag m.v. jvfr. § 60, som en person bosiddende på Færøerne eller et aktieselskab, interesseselskab, partsrederi, andre selskaber eller foreninger, indregistreret på Færøerne og hvor den virkelige ledelse har hovedsæde på Færøerne, som ydes som vederlag for arbejde, udført ombord på et skib, indregistreret i det Færøske Internationale Skibsregister FAS, refunderes til rederiet i henhold til bestemmelserne i denne paragraf.

Stk. 2. Engang om måneden foretager Líkningarráð Føroya en opgørelse over samtlige udbetalinger, som hvert enkelt rederi har anvist gennem indeholdelsessystemet den foregående måned for arbejde, udført ombord på et skib, indregistreret i FAS, og som er omfattet af bestemmelserne i stk. 1. Siden overfører Føroya Gjaldstova i slutningen af måneden den fastsatte procentdel af udbetalingerne tilbage til rederiet.

Stk. 3. Den årlige tilbagebetaling efter stk. 1 udregnes efter gennemsnitsskatteprocenten forrige indkomstår for de lønmodtagere, som i samme indkomstår fik vederlag

borð á skipum, ið koma undir ásetingarnar í stk. 1.

Stk. 4. Líkningarráð Føroya lýsir í kunngerð í seinasta lagi 1. november afturberingarprosentið galdandi fyri komandi inntøknár. Afturberingarprosentið fyri inntøkuárini 1992 og 1993 verður 28%.

Stk. 5. Føroya landsstýri kann við kunngerð áseta nærri reglur fyri skip, sum koma undir ta í stk. 1 nevndu skipan.

Stk. 6. Líkningarráð Føroya kann áseta nærri reglur fyri afturberingina sbrt. hesi grein."

3) Sum nýggj § 83 a verður sett:
"Afturberingin sambært § 63a verður borin av landskassanum og kommununum í sama lutfalli, sum skatturin annars og verður drigin frá avrokningini av skattinum til kommununar innan avrokning eftir § 83.

Stk. 2. Samlaði partur kommununnar av afturberingini eftir stk.1 verður borin av øllum kommununum lutfalsliga eftir skattinum í seinasta álíknaða ári. Lutfallið verður roknað tann 1. november í álíkningarárinum og er endaligt."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

for tjeneste ombord på skibe, som var omfattet af bestemmelserne i stk. 1.

Stk. 4. Likningsrådet Føroya bekendtgør senest 1. november refusionsprocenten, gældende for næste indkomstår. Refusionsprocenten for indkomstårene 1992 og 1993 udgør 28%.

Stk. 5. Færøernes landsstyre kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser vedrørende skibe, som omfattes af bestemmelserne i den i 1. stk. nævnte ordning.

Stk. 6. Likningsrådet Føroya kan fastsætte nærmere bestemmelser om refusionen i.h.t. denne paragraf."

3) Som ny § 83 a indsættes:
"Refusionen i henhold til § 63 a udredes af landskassen og kommunerne i samme forhold, som skatten iøvrigt og fradrages i opgørelsen af skatten til kommunerne inden afregning i henhold til § 83.

Stk. 2. Kommunernes samlede andel af refusionen efter stk. 1 udredes af samtlige kommuner i samme forhold, som kommunernes skat i sidste slutligningsår. Forholdet udregnes den 1. november i påligningsåret og er endelig."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Ætlan landsstýrisins er at seta á stovn eina føroyska altjóða skipaskrá, nevnd FAS, eins og grannalondini hava gjørt. Hetta heldur landsstýrið vera neyðugt, um føroysk farma- og ferðaskip skulu kunnu gera seg galdandi í altjóða kapping.

Skotið verður tí upp at hroyta skattalógina soleiðis, at ávíst prosent av teirri hýru, sum verður latin fyri arbeiði, sum er gjørt umborð á skipi, skrásett í FAS, verður afturborið avvarðandi reiðaravirki, uttan at afturberingin skal tengjast at skattaútrokningini fyri hvønn einstakan persón, men í staðin sum eitt árliga ásett prosent, útroknað eftir miðalskattaprosentinum hjá manningunum, ið undanfarna ár høvdu lønarinntøku, fyri tænasto umborð á skipum, skrásettum í FAS.

Afturberingin verður eftir uppskotinum at flyta reiðaravirkinum einaferð um mánaðin, síðst í mánaðinum aftan á uppgerðina, t.v.s. allar útgjaldingar frá tí einstaka reiðaravirkinum verða uppgjørdar sum ein mánaðarlig pulja. T.d. fara útgjaldingarnar fyri august mánaða vanliga at verða uppgjørdar í fyrstu viku av september. Síðan skal uppgerðin fráboðast Gjaldstovuni, og Føroya gjaldstova fer so síðst í september at flyta reiðaravirkinum afturberingina fyri august mánað.

Við hesi skipan slepst undan teimu trupulleikum, ið kunnu standast av, at manningin hevur ymisk skattlig viðurskifti og hurav fylgjandi ójavna í afturberingini.

Reiðaravirkini fara eftir uppskotinum øll at fáa sama prosentpart av útgoldnum lønum afturbornan. Munurin fer bert at verða í krónutali alt eftir, hvussu nógva løn hvørt einstakt reiðaravirki hevur útgoldið.

Av tí at 1992 er fyrsta inntøkuárið, skipanin er ætlað at virka, er eftir lógaruppskotinum neyðugt at áseta prosentið fyri 1992 og 1993 saman við lógaruppskotinum, tí fyritreytirnar fyri tí uppskotnu útrokningini av afturberingarprosentinum, eru ikki til staðar fyrr enn í nov. 1993. Afturberingarprosentið fyri 1992 og 1993 má tó ásetast eftir somu prinsippum, sum í uppskotinum ásett fyri komandi ár, t.v.s. út frá einum miðalskattaprosenti frá 1990 og 1991.

Uppskotið leggur upp til, at afturberingin skal berast av landi og kommunum í felag í mun til samlaða skattin. Ætlanin er, at afturberingin skal berast av landi og kommununum, sum vanliga lutfallið í skattinum hjá landi og kommununum er, tað vil í løtuni siga, umleið 60% verða borin av landinum og umleið 40% av kommununum. Kommununnar partur av afturberingini skal verða borin av øllum kommunum í felag, býtt lutfalsliga eftir skattinum. Hervið kann sleppast undan, at ein lítil kommuna, ið hevur størsta partin av síni inntøku av skatti frá løntakarum, ið fáa inntøku frá skipi, ið kemur undir FAS skipanina, nærum missir allar inntøkurnar. Um allar kommunurnar bera kostnaðin av afturberingini í felag, fer afturberingin ikki at "merkjast" so ójøvn og fíggjarliga tung, sum tá ein einstøk komm-

una kundi mist nærum alla sína inntøku, um tað bert vóru kommunur, ið høvdu løntakara við "FAS-inntøku", ið skuldi bera afturberingina saman við landinum.

Kommununnar partur av afturberingini verður borin av kommunum eftir teirra lutfalsliga býti av skattinum í tí ári, ið afturberingarprosentið eisini er roknað eftir, t.v.s. altíð forskotið tvey ár.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar

Í § 2 verður við nýggjum lítra j) inntøka frá FAS skrásettum skipum tikin við sum avmarkað skattskyldug inntøka hjá persónum, sum ikki búgva í Føroyum.

Í § 63 a verður heimild til at bera reiðaravirkinum aftur ávist prosent av útgoldnu hýruni fyri skip, skrásett í FAS.

Í stk. 2 verður ásett, at berast skal aftur hvønn mánað.

Í stk. 3 verður ásett, at afturberingarprosentið verður ásett árjavnt við miðalskattaprosent av inntøkunum hjá løntakarunum, sum árið frammanundan hava havt inntøkur fyri tænastur umborð á føroyskum skipi, skrásett í FAS.

Stk. 4 setir freistina fyri ásetingini av afturberingarprosentinum fyri komandi árið. Freistin verður sett, so at líkningin kann verða liðug, tí tástani eru tølini til útroknan av miðalskattaprosentinum til taks. Síðan verður ásett í stk. 5, at Føroya landsstýri kann áseta nærri reglur fyri, hvørji skip kunnu koma undir skipanina, her verður t.d. hugsað um, hvørjar treytir verða settar viðvíkjandi støddd á skipi, hvar tað kann sigla, eigaraviðurskifti o.s.fr. Hetta verður neyðugt, fyri við vissu at kunna siga, hvør hevur rætt til ta uppskotnu afturberingina.

Í stk. 6 verður ásett, at Líkningarráð Føroya fær heimild til at áseta í kunngerð nærri reglur fyri afturberingini eftir § 63 a. Her verður einamest hugsað um reglur fyri skráseting av teimum reiðaravirkjum, ið rætt eiga til afturbering og krav til prógførslu og saman av tí manntali, sum er umfatað av skipanini, (mynstringarlistar o. l.).

Í øðrum altjóða skipaskráum er meira vanligt, at manningin rindar ikki skatt til flagglandið, men í staðin fær eina løn svarandi til eina nettoløn aftaná, at skattur er frádrigin. Við teirri skipan, sum her er skotin upp, har manningin rindar skatt sum vanligt, men afturberingin verður til reiðaravirkið, er neyðugt at tryggja sær, at reiðaravirkið annaðhvørt fellur inn undir §§ 1 ella 2 í skattalógini, t.v.s. antin er skrásett í Føroyum, og harvið er undir fullari skattskyldu, ella hevur fast rakstrarstað í Føroyum, og harvið verður skattskyldugt av tí partinum av virkseminum, ið fer fram í Føroyum.

Her skal eisini verða víst á, at eftir lógaruppskotinum til FAS, kunnu skip skrásetast samb. § 1 í sjólógini sum føroysk skip. § 1 í sjólógini setir treytir millum annað til ríkisborgararætt og leiðslu, og at útlendsk feløg skulu vísa á ein umboðsmann, sum kann taka ímóti boðum ella stevning eigarans vegna, men einki verður sagt um, hvar leiðslan skal hava sæti sítt.

Í tí tvískattasáttmála, sum Føroyar hava gjørt við onnur lond stendur: "Inntøka, sum eitt virki, ið er heimahoyrandi í einum sáttmálabundnum ríki, hevur av skipa- ella loftferðslurakstri í altjóða samferðslu, kann bert verða skattað í tí sáttmálabundna ríkinum, har sum verðuliga leiðslan hevur sæti".

Tí eigur at verða ansað eftir, at annað land ikki fer við skattinum hjá manningini, meðan reiðaravirkið fær afturberingina.

Tí er sett í § 63 a, at treytin fyri at fáa afturberingina er, at reiðaravirkið antin er skrásett í Føroyum, ella hevur fast rakstrarstað í Føroyum.

Í § 2 verður áset, at lógin fær gildi fyrstu ferð fyri inntøkuárið 1992, t.v.s. fyri inntøkur, útgoldnar frá 1. januar 1992 og framyvir.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 53/1991: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 5. december 1991. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum nr. 55: Føroysk altjóða skipaskrá, 52: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, 54: Broytingar í løgtingslóg um manning av skipum og 56: Broytingar í løgtingslóg um sjóvinnu, sum eftir 1. viðgerð 10. december 1991 øll vórðu beind í Íðnaðarnevndina. Vist verður til viðmerkingarnar í álitinum í máli nr. 55: Føroysk altjóða skipaskrá.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Frank Davidsen, Jóannes Dalsgaard og Finnbogi Arge) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tí við teirri broyting, at tá tað ikki er heilt samsvar í lógartekstinum millum stk. 3 og stk. 4 í § 1, punkt. 2, verður sett fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

Í § 1, punkt. 2. stk. 3, verður í staðin-fyri orðini: "eftir meðalskattaprosentinum" sett: "við atliti til skattaprosentið".	I § 1, punkt 2, stk. 3 ændres ordene: "efter gennemsnitsskatteprocenten" til: "med henblik på gennemsnitsskatteprocenten".

Minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við málinum, setir einki uppskot fram.

55. Føroysk Altjóða Skipaskrá

Uppskot

til

Løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá.

Lagtingslov om Føroyska Altjóða Skipaskrá.

Kapittul 1.
Lógarøki.

§ 1.

Í Føroysku Altjóða Skipaskránni verða tikin upp føroysk skip, jvb. løgtingslóg um skráseting av skipum v.m. § 1, sum eru 100 skrásett tons brutto ella meira og 100 tons brutto ella meira.

Stk. 2. Eitt skip, sum er 100 skrásett tons brutto ella meira og 100 tons brutto ella meira, sum er útlendsk ogn, kann verða tikið upp í skránna, um:

1)a føroyingar ella partafeløg og onnur feløg við avmarkaðari ábyrgd, sum hava valt eina nevnd, tá í minsta lagi tveir triðingar av hesari eru føroyingar, ella onnur feløg, har í minsta lagi tveir triðingar av luttakarunum eru føroyingar,

b) sum reka reiðaravirki sum ein týðandi tátt,

c) hava stóran beinleiðis ella óbeinleiðis ognarpart í útlendska felagnum og

d) sambært ognarpartinum týðandi ávirkan við atkvøðurætti ella líknandi, og

2) útlendska felagið hevur sett eitt umboð her á landi, sum kann taka ímóti

Kapitel 1.
Lovens område.

§ 1.

I Føroysk Altjóða Skipaskrá optages færøske skibe, jfr. lagtingslov om registrering af skibe m.v. § 1, som er 100 bruttoregistertons eller derover og 100 bruttotons eller derover.

Stk. 2. Et skib, som er 100 bruttoregistertons eller derover og 100 bruttotons eller derover, som er udenlandsk ejet, kan optages i registret, såfremt:

1)a færinger eller aktieselskaber og andre selskaber med begrænset ansvar, der har valgt en bestyrelse, når mindst to tredjedele af denne består af færinger, eller andre selskaber, hvori mindst to tredjedele af deltagerne er færinger,

b) som driver rederidrift som en væsentlig aktivitet,

c) har betydelig direkte eller indirekte kapitalandel i det udenlandske selskab,

d) samt i medfør af kapitalandelen en betydelig indflydelse ved stemmeret eller lignende, og

2) det udenlandske selskab har ud-

kunnuggering vegna eigaran, hevur fulltrú til at handla mótvegis skrásetingarmyndugleikunum, og hevur ábyrgdina av, at tær skyldur, sum hvíla á reiðarínum eftir hesi lóg, verða lýddar.

Stk. 3. Prámar, lossingarbátar, dýpingarmaskinur, flótikranar, flótandi boripallar og líknandi verða at meta sum skip eftir lógini. Flótidokkir, kaðaltrumlur, flótandi íløt og onnur líknandi amboð verða ikki meti sum skip.

Stk. 4. Leiðarin av Skipaskránni kann í serligum førum loyva, at eitt skip verður tikið upp í Føroysku Altjóða Skipaskránna, sjálvt um tjóðskapartreytirnar í stk. 1, ikki eru loknar.

§ 2.

Fiskifør og stuttleikafør kunnu ikki verða tikin upp í Føroysku Altjóða Skipaskránna.

§ 3.

Eitt skip, sum er skrásett í føroysku Altjóða Skipaskránni, er undir føroyskum flaggi og stendur undir føroyskum rætti.

§ 4.

Skip, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, mugu ikki flyta ferðafólk ella farm millum føroyskar havnir.

Stk. 2. Hetta er tó ikki galdandi fyri umskiping av farmi beinleiðis til ella frá útlandi, ella tá ið tað vegna støddina av farminum ella av øðrum ávum ikki eru

peget en repræsentant her i landet, som kan modtage forkyndelse af stævning på ejerens vegne, er bemyndiget til at optræde på ejerens vegne i forhold til registermyndighederne og er ansvarlig for, at de pligter, der påhviler rederiet efter denne lov, efterkommes.

Stk. 3. Pramme, lægtere, uddybningsmaskiner, flydekrane, flydende boreplatforme og lignende anses som skibe efter loven. Flydedokke, kabeltromler, flydende beholdere og andet lignende materiel anses ikke som skibe.

Stk. 4. Lederen af Skibsregistret kan i særlige tilfælde tillade, at et skib optages i Føroysk Altjóða Skipaskrá, selv om nationalitetsbetingelserne i stk. 1, ikke er opfyldt.

§ 2.

Fiskefartøjer og fritidsfartøjer kan ikke registreres i Føroysk Altjóða Skipaskrá.

§ 3.

Et skib, der er registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá, er under færøsk flag og er undergivet færøsk ret.

§ 4.

Skibe, der er registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá, må ikke transportere passagerer eller gods mellem færøske havne.

Stk. 2. Dette er dog ikke gældende for omskibning af gods direkte til eller fra udlandet, eller når der på grund af god-

nýtulig skip, sum kunna átaka sær flutningin.

Kapittul 2.
Skráseting.

§ 5.

Leiðarin av Skipaskránni stendur fyri skránni.

Stk. 2. Áheitan um skráseting av einum skipi í Føroysku Altjóða Skipaskránni sleppur eigaranum undan frálíðanarskylduni sambært løgtingslóg um skráseting av skipum v.m.

§ 6.

Skráseting verður gjørd annaðhvørt sum flutningur frá Skipaskránni við øllum rættindum og byrðum, sum flutningur frá útlendskari skrá ella sum nýupptøka av liðugtbygdum skipi.

§ 7.

Eitt skip, sum er skrásett í aðrari skrá, kann ikki samstundis vera skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni.

§ 8.

Eigarin av skipi, sum er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, skal fráboða viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri ta framhaldandi skrásetingina.

Kapittul 3.
Lønar- og arbeiðsviðurskifti.

§ 9.

Sáttmálar millum føroyskt reiðarí ella reiðarafelag og føroyskt sjómannafelag um lønar- og arbeiðsviðurskifti fyri manning umborð á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, kunnu

sets størrelse eller af andre grunde ikke findes egnede skibe, som kan påtage sig transporten.

Kapitel 2.
Registreringen.

§ 5.

Registret forestås af lederen af Skibsregistret.

Stk. 2. Anmodning om registrering af et skib i Føroysk Altjóða Skipaskrá fritager ejeren for anmeldelsespligten i henhold til lagtingslov om registrering af skibe m.v.

§ 6.

Registrering kan enten ske ved overførsel fra Skibsregistret med samtlige rettigheder og byrder, ved overførsel fra udenlandsk register eller som nyoptagelse af færdigbygget skib.

§ 7.

Et skib, der er registreret i et andet register, kan ikke samtidig være registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá.

§ 8.

Ejeren af et skib, som er registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá, skal anmelde forhold, som kan have betydning for den fortsatte registrering.

Kapitel 3.
Løn- og arbejdsforhold.

§ 9.

Overenskomster mellem færøsk rederi eller rederiforening og færøsk sømandsforbund om løn- og arbejdsforhold for ansatte ombord på skibe, registreret i Før-

bert fevna um persónar, búsitandi í Føroyum, ella sum sambært millumlanda avtalu skulu javnmetast við persónar við heimarætti í Føroyum.

Stk. 2. Sáttmálar millum føroyskt reiðarí ella reiðarafelag og útlendskt sjómannafelag um lønar- og arbeiðsviðurskifti fyri manning umborð á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni kunnu bert fevna um persónar, sum eru limir í Sjómannafelagnum og sum eru ríkisborgarar í tí landi, sum avvarðandi felag boyrir heima.

Kapittul 4.
Striking.

§ 10.

Um treytirnar fyri skráseting, jvb. § 1, ikki longur eru til staðar, strikar leiðarin av Skipaskránni skipið úr Føroysku Altjóða Skipaskránni.

Stk. 2. Leiðarin av Skipaskránni kann harumframt strika eitt skip úr Føroysku Altjóða Skipaskránni, um brot verður framt á § 4.

Stk. 3. Um eigarin er føroyskur, jvb. løgtingslóg um skráseting av skipum v.m. § 1, og tað ikki er onnur grund fyri striking, sum umrøtt í løgtingslóg um skráseting av skipum v. m. § 26, stk. 2, flytir leiðarin av Skipaskránni skipið til Skipaskránna við øllum skrásetlum rættindum og byrðum.

Kapittul 5.
Revsireglur v.m.

§ 11.

Landsstýrið kann áseta nærri reglur um:

oysk Altjóða Skipaskrá, kan kun omfatte personer, bosiddende på Færøerne, eller som ifølge international aftale skal sidestilles med personer hjemmehørende på Færøerne.

Stk. 2. Overenskomster mellem færøsk rederi eller rederiforening og udenlandsk sømandsforbund om løn- og arbejdsforhold for ansatte ombord på skibe, registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá, kan kun omfatte personer, der er medlemmer af sømandsforbundet og som er statsborgere i det land, hvori vedrørende forbund er hjemmehørende.

Kapitel 4.
Udslettelse.

§ 10.

Hvis betingelserne for registrering, jfr. § 1, ikke længere er til stede, udsletter lederen af Skibsregistret skibet af Føroysk Altjóða Skipaskrá.

Stk. 2. Lederen af Skibsregistret kan endvidere udslette et skib af Føroysk Altjóða Skipaskrá ved overtædelse af § 4.

Stk. 3. Hvis ejeren er færøsk, jfr. lagtingslov om registrering af skibe m.v. § 1, og der i øvrigt ikke foreligger nogen udslettelsesgrund, som omhandlet i lagtingslov om registrering af skibe m.v. § 26, stk. 2, overfører lederen af Skibsregistret skibet til Skibsregistret med samtlige registrerede rettigheder og byrder.

Kapitel 5.
Straf m.v.

§ 11.

Landsstyret kan fastsætte nærmere reg-

1) í hvønn mun reglurnar í løgtingslóg um skráseting av skipum v.m. verða at nýta, fyri skip, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni,

2) skipan og leiðslu av skránni,

3) útgávu tjóðskaparbræva,

4) merking skipa,

5) krøv til tann føroyska ognarpartin ella ávirkan annars í útlendska felagnum, jvh. § 1, stk. 2, nr. 1, sum hevur eitt skip skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni,

6) at avgerðir eftir lógini hjá leiðaranum av Skipaskránni ikki kunnu leggjast fyri hægri umsitingarligan myndugleika,

7) at eigarin skal gjalda fyri upptøku í og striking úr skránni, og

8) rættin hjá útlendskum sjómonnum at starvast á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskánni.

§ 12.

Tann, sum ikki heldur § 4 ella § 8 verður sektaður.

Stk. 2. Í forskriftum, sum verða givin út av landsstýrinum við heimild í lógini, kunnu ásetast reglur um sekt fyri brot á hesar forskriftir.

Stk. 3. Er brotið framt av partafelagi, lutafelagi ella líknandi, kann bótábyrgd verða áløgd felagnum sum slíkum.

ler om:

1) i hvilket omfang bestemmelserne i lagtingslov om registrering af skibe m.v. skal finde anvendelse på skibe, registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá,

2) registerets indretning og førelse,

3) udfærdigelse af nationalitetsbeviser,

4) mærkning af skibe,

5) krav til den færøske kapitalandel eller indflydelse i øvrigt i det udenlandsk selskab, jfr. § 1, stk. 2, nr. 1, som har et skib registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá,

6) at lederen af Skibsregisterets afgørelser efter loven ikke skal kunne indbringes for højere administrativ myndighed,

7) at ejeren skal betale et gebyr for optagelse og udslettelse af registeret, og

8) udenlandske sømænds ret til at arbejde ombord på skibe, registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá.

§ 12.

Den, der overtræder § 4 eller § 8 straffes med bøde.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes af landsstyret i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelser af forskrifterne.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges virksomheden som sådan.

Kapittul 6.
Gildiskoma.

§ 13.

Hendan lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapitel 6.
Ikrafttræden.

§ 13.

Denne lov træder i kraft dagen efter be-

Viðmerkingar

Landsstýrið samtykti á vári 1991, at seta nevnd at gera uppskot til lóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá (FAS), við tí í hyggju, at skráin skal koma at virka frá 1. januar 1992. Hetta var hildið at vera neyðugt, fyri at betra um kappingarførið hjá føroyskum skipum í beinleiðis altjóða kapping, nú fleiri lond - herímillum norðurlond - eru farin undir líknandi skipanir. Nevndin hevur síðani arbeitt við hesum máli, og hevur umframt at orða uppskot til sjálva FAS-lógina, gjørt uppskot um broytingar í skattalógini, manningarlógini, sjóvinnulógini og sjómanslógini.

FAS-lógaruppskotið inniheldur í høvuðsheitum bert reglur um, hvørjar treytir skipini skulu lúka fyri at verða skrásett, men ikki reglur um, hvørjar rættarfylgjur, skrásetingin hevur. Hetta er nærri ásett í uppskotunum til broytingar í omanfyri nevndu lógum, m.a. um afturbering av skatti. Tó er í § 9 í lógini ásett, at sáttmálar millum føroyskt reiðarí ella reiðarafelag og føroyskt sjómannafelag um lønar- og arbeiðsviðurskifti fyri manningar umborð á skipum, skrásett í FAS, bert kunnu fevna um persónar, búsitandi í Føroyum. Føroysk reiðarí eru sostatt ikki bundin av mótstandandi avtalu við føroysk sjómannafeløg, t. d. um ikki at hava útlendska manning umborð.

FAS-skipanin má eftir uppskotinum sigast at vera ein rættuliga "opin" skipan, bæði hvat viðvíkur tjóðskaparkrøvum til skipaeigaran og til manning. FAS-lógin hevur fyri tað fyrsta sambært eini tilvísing til løgtingslóg um skráseting av skipum v. m., eina víða fatan av, nær ein skipaeigari skal metast sum føroyskur. Eftir uppskotinum skal eitt partafelag ella annað felag við avmarkaðari ábyrgd metast sum føroyskt, um 2/3 av nevndini eru føroyingar (tvs. danskir ríkisborgarar, búsitandi í Føroyum), og ger tað ongan mun, um t.d. allur partapeningur er útlendskur.

Harnæst hevur skipaeigari, sum ikki lýkur treytirnar omanfyri fyri at roknast sum føroyskur, møguleika at fáa skip skrásett eftir § 1 stk. 2 í lógaruppskotinum. Hetta krevur, at talan er um felag, og at føroyingar, sum reka reiðaravirki sum ein týðandi táttur, hava stóran ognarpart og týðandi ávirkan í felagnum. Harafturat má felagið hava sett ein persón her á landi, sum umboðar felagið, og sum hevur ábyrgdina av, at tær skyldur, sum hvíla á felagnum smb. FAS-lógini verða lýddar.

Hvat viðvíkur manningarsíðuni, hevur reiðaravirkið sum omanfyri nevnt, sjálvt við mótstandandi avtalu við føroyskt sjómannafelag, rætt til at hava útlend-

ska manning umborð. Landsstýrinum er tó smb. § 11 nr. 8) í lógaruppskotinum heimilað at gera nærri reglur um rættin hjá útlendskum sjómonnum at starvast umborð á FAS-skipum.

Skip, sum ikki virka í beinleiðis altjóða kapping, jvb. grundgevingina fyri at stovnseta FAS, kunnu ikki verða skrásett. Við hesi grundgeving er tað í § 2 ásett, at fiskifør og stuttleikafør ikki kunnu verða upptikin í skránna. Tað er eftir uppskotinum heldur ikki loyvt FAS-skipum at flyta farm ella ferðafólk millum føroyskar havnir, tá betta vildi givið teimum ein órímiligan fyrimun framum skip, skrásett í Skipaskránni. Undantak frá hesi reglu er gjørt, tá ið tað vegna støddina av farminum ella av øðrum ávum ikki eru onnur skip, sum kunnu átaka sær flutningin. Fyri at spara havnir, er undantak eisini gjørt, tá talan bert er um umskiping beinleiðis til ella frá útlandinum.

Lógaruppskotið er gjørt við fyrimynd í reglum um altjóða skipaskráir í øðrum londum. Hetta fyrst og fremst tí, at FAS fyri at standa seg í kappingina við hesar, í minsta lagi má bjóða samsvarandi søndir. Nevndin hevur í stóran mun valt at skipa lógina sum eina rammulóg. Landsstýrið fyrireikar tekniskar loysnir og nærri reglur, serliga um skráseting av rættindum, sum verða at ásetta í kunngerð.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar

Til § 1, stk. 1.
Skip, sum kunnu verða skrásett, skulu í minsta lagi vera 100 BrT/100 BT til støddar. Tað verður ikki hildið at vera nakar praktiskur tørvur fyri skráseting av skipum, sum sigla í beinleiðis altjóða kapping, undir hesa støddd.

Til § 1, stk. 2.
Tað liggur í ætlanini at stovnseta FAS, at útlendskur skipaeigari skal hava møguleika fyri skráseting av skipi. Tað er sostatt ikki nøkur treyt fyri partafeløg, at tey fyrst verða skrásett í føroysku partafelagsskránni, áðrenn tey kunnu skrásetast sum eigari av skipi í FAS. Føroyingar skulu tó framvegis hava ávirkan í felagnum, men er tað ikki ætlanin, at halda líka strong krøv, sum eru galdandi fyri uppløku í Skipaskránni. Ein hækking av krøvunum liggur tó í, at føroyska ávirkanin nú skal stava frá beinleiðis ella óbeinleiðis ognarparti í útlendska felagnum. Um FAS skal fáa nakran praktiskan týdning, má kravið til støddina av tí føroyska ognarpartinum, eftir nevndarinnar meting ikki setast til meira enn 20-25 %. Landsstýrinum er eftir § 11, nr. 8) heimilað at áseta nærri reglur um hesi viðurskifti.

Sum ein natúrlig fylgja av atgongdini hjá útlendskum feløgum at fáa skip skrásett, verður sett krav til útlendskt felag um persónliga umboðan her á landi. Hetta krav verður ikki sett føroyskum feløgum, tá hetta longu fylgir av lóggávuni annars.

Til § 9.

Sáttmálar eftir stk. 1 eru, um ikki frávik er gjørt við millumtjóða avtalu, bert galdandi fyri persónar búsitandi í Føroyum. Reglan í stk. 2 er meira umfatandi enn í stk. 1, eftirsum sáttmálar eftir stk. 2, umframt bert at galda fyri ríkisborgarar í tí landi, sjónannafelagið hoyrir heima, bert eru galdandi fyri limir í viðkomandi felag. Reiðaravirkini hava sostatt smb. stk. 2 bæði møguleika fyri at gera felags- og einstakar sáttmálar.

Samstundis, sum loyvt verður útlendingum at starvast á føroyskum skipum, verður mett, at ein øking í skipatalinum samstundis fer at skapa øktar møguleikar fyri fleiri føroyskum arbeiðsplássum umborð.

Felagsálit

í

Løgtingsmáli nr. 55/1991: Føroysk altjóða skipaskrá.
Løgtingsmáli nr. 52/1991: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til lands kassan.
Løgtingsmáli nr. 54/1991: Broytingar í løgtingslóg um manning av skipum og løgtingsmáli nr. 56/1991: Broytingar í løgtingslóg um sjóvinnu.

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 5. december 1991 og eftir 1. viðgerð 10. december 1991 beint í Ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt løgtingsmálini nr. 52, 53, 54, 55 og 56 undir einum, hvar málið nr. 55: *Føroysk altjóða skipaskrá* er høvuðsmálið, og verður eisini álitið í hesum máli høvuðsálitið.

Nevndin hevur havt fund við Kaj P. Mortensen, fulltrúa í landsstýrinum, sum hevur arbeitt við málinum og eisini hevur sjóvinnumál undir sær. Sam Hansen, fulltrúi á Líkningarráð Føroya, hevur eisini verið á fundi til at greiða frá teim skattligu viðurskiftunum.

Undir 1. viðgerð av máluntum var nakað rætt um, hvørt málini skuldu fara í Skattanevndina ella Ídnaðarnevndina. Ídnaðarnevndin helt tað tí vera rætt, at bjóða formanninum í skattanevndini á fund, so hann kundi verða kunnaður um, hvussu málini vórðu viðgjørd í Ídnaðarnevndini. Vilhelm Johannesen, formaður í Skattanevndini, gjørdi so væl at koma á fund.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Frank Davidsen, Jóannes Dalsgaard, Finnbogi Arge) er greiður yvir, at tað kann tykjast sum um, at landskassin missir pening við at seta hesar lógir í gildi, men meirilutin er eisini greiður yvir, at um hetta ikki verður gjørt, so koma farmaskip at fara úr føroyska flotanum, og tá er hesin peningur

mistur kortini. Um skipini verða verandi undir føroyskum flaggi, liggur tó nakað av peningi eftir í landinum. Koma onnur skip undir føroyskt flagg, sum nakrir rokna við, so geva tey eyka inntøkur. Líknandi tiltøk eru roynd í okkara grannalondum, og hava tey roynst væl. Tí tekur meirihlutin undir við uppskotum landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tey við undantak av løgtingsmáli nr. 53/1991: *Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt*, har broytingaruppskot er sett fram.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) finnur onga orsøk ella fyrimunir í at samtykkja uppskot landsstýrisins í fyriliggjandi líki. Talan er um so grundleggjandi broyting í okkara samfelagsbygnaði, tá hugsað verður um skyldur og krøv, at als eingi grundarlag er fyri, at vit skulu hava hesa fremmandu skipan, havandi í huga hetta veika og lítla samfelag.

Tað arbeiðið, ið gjørt er, og tað, ið komið er fram undir nevndarviðgerðini, gevur onga ábending um nakran fyrimun við skipanini.

Her verður fyri størsta partin talan um stuðul til ávís vinnurekandi her á oyggjunum í kapping um føroyskan farmaflutning. Av 17 skipum í flotanum, eru tey 7 í uttanlandssigling burturav.

Tað hevur ikki verið møguligt undir nevndarviðgerðini at fingið nakra kunning um, hvar og hvør kappingin er, ið grundar hesa stuðulsveiting.

Um neyðugt, er møguleiki fyri aðrari skipan enn ta, her verður mælt til. Talan er um eina fremmanda skipan við onkrari minni broyting, ið valla er umtalu verd, tá møguligur lítil samfelagsvinningur um 4%, ið allur verður at fara til almenna fyrisiting av hesum virksemi.

Annar spurningurin er so, um hetta lítla samfelag, har so fá eru til at bera samfelagsraksturin er ført fyri at missa hesa stóru samfelagsinntøkuna, ið roknast kann til 50 - 100 milj. kr., tá talan er um 600-700 mans, ið koma at sigla undir FAS og DIS skipanunum.

Tað eigur eisini at viðmerkjast, at hendan stóra upphædd verður tá at leggja á herðarnar á restini av skattgjaldarum, ið valla eru mentir at bera meiri skatt og elvir hetta tá rímiligt til størri lønarkrøv.

Tað er eisini ungfólk okkara, og tá eisini hesir siglandi, ið seta tey stóru krøvini til samfelagsúgóðan, munandi meiri enn pensjónisturin, ið á hendan hátt kemur at bera samfelagsbyrðar, ið kjarnin í samfelagnum við lóggávu verður frítikin fyri, ikki av egnum ávum, men grundað á eina fremmanda skipan.

At rokna við nakrari innflagging til Føroya, tað hevur onga meining, tí um hetta samfelagið er fíggjarliga ført fyri hesum tiltaki, tá er eitthvørt annað samfelag tað sjálvandi eisini.

Tað, at eitthvørt skip í innanlands sigling ikki kann verða við í teirra heimligu skipan, rættvísger ikki føroyska skipan til slíkt endamál.

Tað grundleggjandi má vera, at einhvør nýtari av samfelagságóðanum hevur skyldu at vera við til at bera byrðarnar.

Helst verður ein broyting tann vegin at ávirka eina ávísa flyting, men má hetta tá takast sum rímiligt, og ein lík teim krøvum, sum danir seta fiskimonnum okkara við teirra skipum.

Verður hugsað um tær tekniska broytingarnar í uppskotinum ella eisini manningarskipanina, er beinleiðis skipað eftir donskum viðurskiftum, so her er eingin orsøk til viðmerking.

Annar táttur in er so hann, um ikki meira tørvur er á stuðli innan aðrar partar í samfelagnum, ikki minst tá talan er um rakstur av fiskiskipum. Verður so hugsað um politisku hálkubreytina, tá er tað ógrundað av samgonguni at viðmerkja, at fiskiskip undir ongum umstøðum koma undir hesa skipan.

Minnilutin metir, at alt tilfarið eigur at verða umhugsað av nýggjum, við tí fyri eyga, at møguligur stuðul til hendan føroyska farmaskiparakstur verður at viðgera skip fyri skip, og stuðul veittur, um grundarlag er fyri hesum, tá er eisini møguligt at viðgera heilt aðra skattaskipan fyri býti millum skip og manning, við atliti til hendan, sum bæði ýtara og nýtara av samfelagságóðanum.

Tí verður sett fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður heimilað saman við Fíggjarnevnd løgtingsins at veita stuðul til farmaskiparakstur, um grundarlag er fyri hesum.

56. Broytingar í løgtingslóg um sjóvinnu

Løgtingslóg

um

Broytingar í løgtingslóg um sjóvinnu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 16 frá 3. mars 1988 um sjóvinnu verða gjørdar hesar broytingar:

Lagtingslov

om

Ændring i lagtingslov om sønæring.

§ 1.

I lagtingslov nr. 16 af 3. marts 1988 om sønæring foretages følgende ændringer:

1) § 1, nr. 4) verður strikað.
2) § 4, nr. 2) verður orðað soleiðis:
"hevur havt siglingartíð, sum Føroya landsstýri ásetir, við havskipum,"
3) § 6, nr. 2) verður orðað soleiðis:
"hevur havt siglingartíð, sum Føroya landsstýri ásetir, við havskipum,"
4) Í § 7 verður skoytt uppí aftaná "stýrimaður á" orðingin: "1. ella".
5) § 8 verður strikað.
6) § 9, nr. 2) verður orðað soleiðis:
"hevur havt siglingartíð, sum Føroya landsstýri ásetir, við havskipum og"
7) § 11, nr. 1) verður orðað soleiðis:
"hevur havt siglingartíð, sum Føroya landsstýri ásetir, við havskipum,"
8) § 12 verður orðað soleiðis:
"Til at fáa vinnubræv sum skips maskinistur á 1. ella 2. stigi krevst, at avvarðandi:

1) hevur havt siglingartíð, sum Føroya landsstýri ásetir, við havskipum,
2) hevur staðið maskinistroynd (1-ársroynd) og lokið skeiðsætlan, sum Landsskúlafyrisitingin fyriskipar,
3) og er myndugur."

9) § 13 verður orðað soleiðis:
"Til at fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 1. ella 2. stigi og vinnubræv sum skipsmaskinstjóri krevst, at avvarðandi:

1) hevur siglingartíð, sum Føroya

1) § 1, nr. 4) ophæves.
2) § 4, nr. 2) affattes således:
"har erhvervet en af Færøernes landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,"
3) § 6, nr. 2) affattes således:
"har erhvervet en af Færøernes landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,"
4) I § 7 indsættes efter "styrmand af" ordene: "1. eller".
5) § 8 ophæves.
6) § 9, nr. 2) affattes således:
"har erhvervet en af Færøernes landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe og".
7) § 11, nr. 1) affattes således:
"har erhvervet en af Færøernes landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,"
8) § 12 affattes således:
"Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinist af 1. eller 2. grad kræves, at vedkommende:

1) har erhvervet en af Færøernes landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,
2) har bestået maskinisteksamen (1-års-prøve) og endt kursusplan som Landsskúlafyrisitingin foranstalter og
3) er myndig."

9) § 13 affattes således:
"Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinmester af 1. eller 2. grad samt skibsmaskinchef kræves, at vedkommende:

1) har erhvervet en af Færøernes

landsstýri ásetir, við havskipum,

2) hevur staðið maskinmeistararoynd (3-ársroynd) og
3) er myndugur."

10) §§ 14, 15 og 16 verða strikaðar.
11) Í § 17 verður "§§ 11-16" broytt til: "§§ 11-13".
12) Í § 20 verður sum nýtt stk. 4 sett:
"Føroya landsstýri kann gera frávik frá teimum í stk. 1 ásettu treytum við at áseta nærri reglur um tilsvarandi trygdarútbúgving við atliti til slag av skipum og farleið."

13) § 23, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Til at mynstra sum fulltikin skipsatstøðari skal avvarðandi, tá ið starvssetan er farin fram her á landi, hava lokið treytirnar í § 20, stk. 1 og síðani hava havt tænastu sum ófulltikin skipsatstøðari við havskipum í 18 mánaðir og haraftrat hava verið á góðkendum yrkisskeiði fyri skipsatstøðarar ella hevur fingið útbúgvingarprógv ella sveinabræv sum nevnt í § 20, stk. 3."

14) Í § 23 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Føroya landsstýri kann áseta reglur um, at ófulltiknir skipsastøðarar við sveinabræv ella útbúgvingarprógvi, sum nevnt í § 20, stk. 3, áðrenn mynstring sum fulltikin skipsatstøðari skal hava verið á góðkendum yrkisskeiði fyri skipsatstøðarar, ella fingið aðra útbúgving. Føroya landsstýri kann áseta

landsstyre fastsat fartstid i søgående skibe,
2) har bestået maskinmestereksamen (3-årsprøve) og
3) er myndig."

10) §§ 14, 15 og 16 ophæves.
11) I § 17 ændres "§§ 11-1" til: "§§ 11-13".
12) I § 20 indsættes som nyt stk. 4:
"Færøernes landsstyre kan fravige de i stk. 1 fastsatte bestemmelser samtidig som der stilles tilsvarende krav om sikkerhedsuddannelse under hensyntagen til skibstype og fartsområde."

13) § 23, stk. 1 affattes således:
"For at kunne påmønstre som befaren skibsassistent skal vedkommende, når påmønstring er sket her i landet, have opfyldt betingelserne i § 20, stk. 1 og dernæst have udført tjeneste som ubefaren skibsassistent i søgående skibe i 18 måneder og enten have gennemgået et erhvervsfagligt afslutningskursus for skibsassistenter eller have erhvervet uddannelsesbevis eller svendebrev som omhandlet i § 20, stk. 3."
14) I § 23 indsættes som nyt stk. 2:
"Færøernes landsstyre kan foreskrive, at ubefarne skibsassistenter med svendebrev eller uddannelsesbevis som omhandlet i § 20, stk. 3 for udmønstring som befaren skibsassistent skal have gennemgået et godkendt afslutningskursus for skibsassistenter eller anden uddannelse. Færøernes landsstyre kan

reglur um styttri siglingartíð fyri hesar skipsatstøðarar enn ásett í stk. 1."

15) § 23, stk. 2 og 3 verða § 23, stk. 3 og 4.

16) Aftaná § 23 verður sett:

"Kapittul 2 A.

Føroysk Altjóða Skipaskráseting.

§ 23 a. Á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), kunnu dekks-, maskin- og eindarmanning, hóast starvssetanin er farin fram her á landi ella ikki, mynstra eftir § 20, stk. 2, § 21, stk. 2, § 22, stk. 3 og § 23, stk. 3.

Stk. 2. Á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS) verða útlendsk skeiðsprógv útgivin av útlendskum myndugleika, eftir reglunum í STWC-sáttmálanum javnsett við tey eftir hesi lóg kravdu skeiðsprógv."

16) Í § 27 verður stk. 3 orðað soleiðis:

"Føroya landsstýri kann loyva útgávu av sjóvinnubrævi til persónar við samansettari útbúgving sum navigatørur / maskinmeistari. Føroya landsstýri kann javnseta sjóvinnuútbúgving í útlondum við tær útbúgvingar, sum eru nevndar í hesi lóg."

17) § 32 verður strikað.

18) Í § 35, stk. 1, verða sum nýggj nr. 5 og 6 sett:

"5) Vinnubræv sum skipsmaskinistur við maskinroynd, staðin

foreskrive en kortere fartstid for sådanne skibsassistenter end anført i stk. 1."

15) § 23, stk. 2 og 3 bliver herefter § 23, stk. 3 og 4.

16) Efter § 23 indsættes:

"Kapitel 2 A.

Færøsk Internationalt Skibsregister.

§ 23 a. I skibe, registreret i Færøsk Internationalt Skibsregister (FAS), kan dæks-, maskin- og enhedsmandskab påmønstres i henhold til § 20, stk. 2, § 21, stk. 2, § 22, stk. 3 og § 23, stk. 3, uanset påmønstrings- og ansættelsessted.

Stk. 2. I skibe, registreret i Færøsk Internationalt Skibsregister (FAS), anses udenlandske kursusbeviser udfærdiget af udenlandsk myndighed i henhold til bestemmelserne i STCW-konventionen at svare til de i medfør af denne lov foreskrevne kursusbeviser."

16) I § 27 affattes stk. 3 således:

"Færøernes landsstyre kan tillade udstedelse af fornødent sønæringsbevis til personer med kombineret navigatør/maskinmesteruddannelse. Færøernes landsstyre kan ligestille søfartsuddannelser i udlandet med de i denne lov foreskrevne uddannelser."

17) § 32 ophæves.

18) I § 35, stk. 1 indsættes som nyt nr. 5) og 6).

"5) Bevis som skibsmaskinist, med maskinisteksamen bestået før

áðrenn 1. juli 1988, svarar til vinnubrævsum skipsmaskinistur á 2. stigi.

6) Vinnubrævsum skipsmaskinistur á 3. stigi svarar til vinnubrævsum skipsmaskinmeistari á 2. stigi."

19) Í § 35 verður sum nýtt stk. 5 sett:

"Føroya landsstýri kann geva loyvi til at geva út sjóvinnubrøv til persónar, sum hava staðið prógv eftir "lov nr. 197 af 24. maj 1972 om uddannelse af maskinister og maskinmestre" eftir hesum reglum:

1) Maskinistprógv: Sjóvinnubrævsum skipsmaskinistur á 2. stigi.

2) Maskinmeistaraprógv: Sjóvinnubrævsum skipsmaskinmeistari á 1. ella 2. stigi.

3) Víðkað maskinmeistaraprógv: Sjóvinnubrævsum skipsmaskinstjóri."

1. juli 1988, svarer til bevis som skibsmaskinist af 2. grad.

6) Bevis som skibsmaskinmester af 3. grad svarer til bevis som skibsmaskinmester af 2. grad."

19) I § 35 indsættes som nyt stk. 5:

"Færøernes landsstyre kan tillade udstedelse af sønæringsbevis til personer, der har bestået eksamen efter lov nr. 197 af 24. maj 1972 om uddannelse af maskinister og maskinmestre efter følgende regler:

1) Maskinisteksamen:Sønæringsbevis som skibsmaskinist af 2. grad.

2) Maskinmestereksamen: Sønæringsbevis som skibsmaskinmester af 1. eller 2. grad.

3) Udvidet maskinmestereksamen: Sønæringsbevis som skibsmaskinchef."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Landsstýrið hevur lagt fram uppskot um føroyska altjóða skipaskráseting at koma í gildi hin 1. januar 1992. Endamálið er at betra um kappingarførið hjá føroysku handils- og ferðamannavinnuni í uttanríkissigling, at skapa øktar vinnumøguleikar í handils- og ferðamannavinnuni á føroyskum kjøli, at varðveita flest møgulig handils- og ferðamannaskip og harvið arbeiðspláss í føroyska samfelagnum, at skapa neyðugar fortreytir fyri øking í valutainntøkuni av farmaskipavinnuni og at tryggja arbeiði og inntøkugrundarlag í øðrum vinnupørtum við tilknýti til sjóvinnuna. Til tess at røkka hesum máli verður somuleiðis sett fram uppskot um broytingar í teimum lógum, sum ávirka eina føroyska altjóða skipaskráseting. Hesar lógir eru: Skattalógin og sjóvinnulógirnar um sjómenn, um

sjóvinnu og manning av skipum. Eisini verður víst til uppskotið um nýggja lóg um maskinskúlaútbúgvingar, sum er til viðgerðar í løgtinginum, jbr. løgtingsmál nr. 139/1989. Broytingaruppskotini í sjóvinnulógini, løgtingslóg nr. 16 frá 3. mars 1988, byggja á tær útbúgvingar, sum verða nevndar í uppskotinum um maskinskúlaútbúgvingar. Útbúgvingarskipanin, sum longu nú fer fram í Føroyum fyri maskinist- og maskinmeistaraútbúgvingina eftir donsku skipanini, sum varð broytt í 1988, lúkar nú treytirnar í millumlanda sáttmálanum um sjómansútbúgvingar, um sjóvinnu og um vaktarhald á sjónum frá 1978 (STCW-sáttmálin) fyri skip, ið hava framtøkumegi meira enn 750 kw.

Maskinistútbúgvingin eftir tí nýggju skipanini fer eftir 12 mðr. siglingartíð, at geva rætt til sjóvinnubræv sum skipsmaskinistur á 2. stigi og eftir 24 mðr. siglingartíð og 2 eyka skeið, annað í kølitøkni/hydraulik og hitt í simulatornýtslu, fer at geva rætt til sjóvinnubræv sum skipsmaskinistur á 1. stigi. Fyrverandi maskinistútbúgving eftir einum hálvum ári, fer at geva rætt til sjóvinnubræv sum skipsmaskinistur á 2. stigi. Fyrverandi sjóvinnubræv sum skipsmaskinistur gongur úr, men verður javnsett við vinnubræv sum skipsmaskinistur á 2. stigi.

Tey krøv um siglingartíð, sum eru í lógini, verða í uppskotinum tikin út og verður landsstýrinum heimilað, at áseta krøv um siglingartíð í kunngerð. Hetta verður í dag gjørt fyri sjóvinnubrøv eftir § 2, 3, 5 og 7 og fer soleiðis at verða galdandi fyri øll sjóvinnubrøv. Siglingarkrøvini fyri maskinmeistarar verða stytt við 12 mðr. smb. STCW-sáttmálanum soleiðis, at vinnubræv sum maskinstjóri krevur 36 mðr. siglingartíð og verður í kunngerð ásett nærri, hvussu leingi siglt skal verða við sjóvinnubrævi sum ávikavist skipsmaskinmeistari á 3. stigi gongur út.

Saman við broytingaruppskotinum í manningarlógini koma sjóvinnubrøv eftir STCW-sáttmálanum at fáa tey rættindi, sum eru ásett í hesum sáttmála. STCW-sáttmálin er galdandi fyri Føroyar við gildi frá 18. september 1990.

Sjóvinnulógin kom í gildi hin 1. juni 1989 undantikið § 20, 21, 22 og 23 sambært kunngerð landsstýrisins nr. 37 frá 13. apríl 1989. Hetta varð gjørt, tí eingin sjóvinnuskúli var tøkur og eingin trygdarútbúgving fyriskipað. Sjóvinnuskúlin hevur enn ikki fingið eina endaliga loysn, men ein fyribilsskipan er tó sett í verk. Henda skipan fer neyvan at nøkta eftirspurningin av sjómonnum, sum skulu mynstra fyrstu ferð eftir § 20. Tí verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild til at áseta nærri reglur um tilsvarandi trygdarútbúgving við atliti til ymisk skipasløg og farleið.

Á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, verður skotið upp, at loyvt verður at mynstra eftir somu útbúgvingarkrøvum, sum galdandi í Føroyum. Serútbúgvingar verða eisini her kravdar, tá talan er um kemikaliu- og gasstangaskip, soleiðis sum ásett í STCW-sáttmálanum.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar

Ad 1): Tons verða ikki longur nevnd í lógini. Um tons verður vist til viðmerkingarnar í manningarlógini.

Ad 2-3): Broytingin er,at siglingartíðin verður tikin úr lógini, jbr. viðmerkingarnar.

Ad 4): Vist verður til, at § 8 gongur út, og verður stýrinaður á 1. stigi tikin við í § 7.

Ad 6-8): Vist verður til nr. 2 og 3.

Ad 9): Vist verður til viðmerkingarnar um broytingarnar í maskinistútbúgvingini og rættindini eftir uppskotinum um broytingar í manningarlógini.

Ad 10-12): Broytingin er, at siglingarkrøvini verða tikin úr lógini og ásett við kunngerð. Hinar § verða broyttar samsvarandi.

Ad 13): Vist verður til viðmerkingarnar um sjóvinnuskúlaútbúgvingina. Broytingin er, at landsstýrinum verður heimilað at áseta alternativar reglur til tess at mynstra fyrstu ferð.

Ad 14): Persónar við sveinabræv, sum nevnt í § 20, stk. 3, ella maskinatstøðari fingu eftir lógini loyvi at mynstra, um avvarðandi frammanundan hevði verið á góðkendum yrkisskeiði fyri skipsatstøðarar. Í hesar reglur verður mælt til at broyta soleiðis, at hesir kunnu eisini mynstra sum fulltiknir skipsatstøðarar, um teir bert hava sveinabræv.

Ad 15): Við hesi reglu verður landsstýrinum heimilað at áseta aðra útbúgving enn tilskilað hesum parti av manningini. Samstundis verður heimild fyri at stytta um tey vanligu 18 mðr. siglingarkrøvini.

Ad 16): Vist verður til viðmerkingarnar um Føroysku Altjóða Skipaskránna (FAS) og verður mælt til, at dekks-,maskin- og eindarmanning kemur undir somu reglur sum á skipum í vanligu skipaskránni. Útlendsk skeiðsprógv eftir STCW-sáttmálanum verða góðkend.

Ad 17): Heimilar landsstýrinum at skipa fyri útgávu sjóvinnubræva bæði sum yvirmaður á brúnni og yvirmaður í maskinrúmi fyri persónar, sum lúka nevndu útbúgvingartreytir.

Reglurnar um at javnseta sjóvinnuútbúgvingar í útlondum eru óbroyttar.

Ad 18): Víst verður til viðmerkingarnar undir 1) og mannigarlógini.

Ad 19): Reglan skal tryggja, at givin rættindi ikki verða tikin aftur fyri teir, sum hava 2 ára maskinistútbúgving og skipsmaskinmeistari á 3. stigi.

Ad 20): Reglan skal tryggja, at teir, sum ikki hava fingið sjóvinnubræv hóast lokna útbúgving, framhaldandi varðveita rættin til vinnubræv sum frammanundan.

57. Avtøka av landskassagrunnum

Uppskot

til

Løgtingslóg um avtøku av landskassagrunnum.

Lagtingslov om ophævelse af landskassefonde.

§ 1.

Niðanfyri nevndu grunnar í landskassarokningini verða avtiknir, og saldoin verður flutt til kapitalkonto landskassans. Ognir grunnanna, íroknað útlán hjá grunnum verður ogn landskassans. Landskassin yvirtekur tær skyldur, ið áliggja teim avtiknu grunnunum.

Grunnarnir, ið verða avtiknir eru:

1. Eftirlønargrunnur løgt. - eldri ár
2. Kirkjukassin
3. Umsitingarhús
4. Nýtt tollpakkhús
6. Eftirlønargrunnur kapital
7. Sjónvarpsgrunnur (tollur)
8. Útvarpsgrunnur
9. Berghol og brúgvagerð
12. Grunnur til ymisk mentunarlig endamál
13. Fornminnissavn
14. Útvarpssendistøðir

§ 1.

Følgende i landskasseregnskabet værende fonde afvikles, hvorefter saldoen overføres til landskassens kapitalkonto. Fondenes aktiver, herunder udlån udgør herefter en del af landskassens aktiver. Landskassen overtager de forpligtelser, som påligger de afvikled fonde. Fondene, som bliver afviklet er følgende:

1. Pensionsfond lagt. ældre år
2. Kirkekassen
3. Administrationsbygning
4. Nyt toldpakhus
6. Pensionsfond kapital
7. Fjernsynsfond (told)
8. Radiofond
9. Tunnel- og brobyggeri
12. Fond til diverse kulturelle formål
13. Færøernes Museum
14. Radiostationer

15. Sjónvarpið
16. Norðurlandahús
17. Havnagerð
18. Skúla & Íróttargrunnur
19. Lánigrunnur til íróttaranlegg
21. Nýtt løgtingshús
22. Frítíðargrunnur
23. Endurnýgging av skipaflotanum
24. Útróðrarstøðir
25. Grunnur til fiskiroyndir í fremmandum høvum
31. Asfalteringsgrunnur kommunanna
32. Flogvøllurin
33. Byggigrunnur, bileftirlitið á Bygd
34. Byggigrunnur, bileftirlitið Tórshavn
35. Bileftirlitið-hálkubreyt
36. Móti tapi av lánum og veðhaldum.
38. Landsbanki Føroya
39. Spesialskúlin
40. Lendingagrunnurin
43. Náttúrugripasavn
44. Fróðskaparsetur
46. Bókasøvn, nýstovnan
48. Ansingar- og Røktarheim
49. Vardar íbúðir til pensionistar
50. Fiskiroyndir
51. Kommunali Lánigrunnurin
52. Ílegging til S.E.V.
53. Orkugrunnur (SEV)
55. Føroyahús, Keypmannahavn
56. Samferðsluráðið
57. Sjúkrahúsbygging
58. Dieselmotorsimulator, (Maskinskúlin)
59. Bókasavnsgrunnurin
60. Lán & studningur til bókaútgávu
61. Fólkapensiónsgrunnur
62. Sjómansskúli
63. Ungdóms- og bygdahús

15. Fjernsynet
16. Nordens Hus
17. Havneanlæg
18. Skole & Idraetsfond
19. Lånefond til idraetsanlæg
21. Ny lagtingsbygning
22. Fritidsfond
23. Fornyelse af fiskerflåden
24. Kystfiskestationer
25. Fond til fiskeriforsøg i fremmede farvande
31. Kommunernes asfalteringsfond
32. Lufthavnen
33. Byggefon, biltilsyn på bygd
34. Byggefond, biltilsyn Torshavn
35. Biltilsynet, prøvebane
36. Mod tab af lån og kautioner
38. Færøernes Landsbank
39. Specialskolen
40. Bådehavnsfonden
43. Naturhistorisk Samling
44. Færøernes Akademi
46. Bibliotek, nyetablering
48. Plejehjem i fond
49. Beskyttede pensionistboliger
50. Fiskeriundersøgelser
51. Kommunal Lånefond
52. Investering S.E.V.
53. Energifond (SEV)
55. Færøernes Hus, København
56. Samfærdselsrådet
57. Sygehus, nybyggeri
58. Dieselmotorsimulator, (Maskinskolen)
59. Biblioteksfonden.
60. Lån og tilskud til bogudgivelser
61. Folkepensionsfonden
62. Navigationsskole
63. Ungdoms- og bygdehus

64. Savn í Hoyvík
65. Næmingaheim
67. Læraraskúli
68. Maskinskúli
69. Tekniskir Skúlar
70. Sjóvinnuskúli
71. Fiskiídnaðarskúli
72. Studentaskúlaheim
73. Heilsumiðstøðir
74. Íbúðagrunnurin
76. Studenta- HF-skeið Eysturoy grunnur
77. Studentaskúli, Hoydølum
78. Gomul Prestahús á Nesi
79. Fiskirannsóknarstovan
80. Bókasavn í Klaksvík
81. Jarðarb. og aðrar søguligar keldur
83. Oljugrunnur
84. Grunnur til burturbeining av akfør um
85. Byggigrunnur, serforsorg
87. Hjálpargrunnur móti alkoholmisnýtslu
88. Aðrir studenta & HF skúlar
89. Grunnur tilætlaður brekaðum
91. Grunnur til fiskiskipaupphøgging.

64. Museum i Hoyvík
65. Kollegier
67. Lærerseminarium
68. Maskinskole
69. Tekniske skoler
70. Søfartsskole
71. Fiskeindustriskole
72. Gymnasiekollegie
73. Sundhedscentre
74. Boligfonden
76. Eysturoy Gymnasium- og HF-fond
77. Gymnasium, Hoydalar
78. Gl. præstegård, Nes
79. Fiskeribiologisk laboratorium
80. Bibliotek i Klaksvík
81. Historiske kilder
83. Oliefond
84. Fond til destruering af køretøjer
85. Byggefond til særforsorg
87. Hjælpefondet mod alkoholmisbrug
88. Andre gymnasier og HF-kurser
89. Fond for handicappede
91. Fond til kondemnering af fiskeskibe

§ 2.

Fylgjandi ognir hjá niðanfyri nevndu grunnum verða tó útgoldnar ella fluttar soleiðis, áðrenn grunnurin verður avtikin:

1) *2. Kirkjukassin:* Peningaogn grunsins verður útgoldin Kirkjugrunninum áðrenn grunnurin (kirkjukassin) verður avtikin.
2) *15. Sjónvarpið:* Peningaogn grunsins verður útgoldin Sjónvarpi Før-

§ 2.

Følgende aktiver i de ovenfornævnte fonde bliver dog udbetalt eller overført således, inden fonden bliver afviklet:

1) *2. Kirkekassen:* Fondens pengeformuer bliver udbetalt Kirkefonden inden fonden (kirkekassen) bliver afviklet.
2) *15. Fjernsynet:* Fondens pengeformuer bliver udbetalt til Færøernes

oya áðrenn grunnurin verður avtikin.

3) *64: Savn í Hoyvík:* Grunnurin verður lagdur saman við grunni nr. 66 Umvælingarstudningur til friðað hús.

4) *78. Gomul prestahús á Nesi:* Grunnurin verður lagdur saman við grunni nr. 66. Umvælingarstudningur til friðað hús.

§ 3.

Fylgjandi grunnar verða umskipaðir til eksternar grunnar:

1) *11. Mentanargrunnurin:* Grunnurin verður umskipaður til eksternan grunn, og ognir landskassagrunsins verða fluttar eksterna grunninum.

2) *12. Grunnur til ymisk mentanarlig endamál:* Grunnurin verður lagdur saman við mentanargrunninum, og verður sostatt ein eksternur grunnur.
Peningaogn grunsins verður flutt mentanargrunninum.

3) *20. Gistingarhúsgrunnurin:* Grunnurin verður umskipaður til eksternan grunn. Ognir landskassagrunsins verða fluttar eksterna grunninum. Landsstýrið ger nærri reglur fyri útgjaldingum úr grunninum.

4) *28. Kirkjubønárurin:* Grunnurin verður umskipaður til eksternan grunn og peningaognir landskassagrunsins verða fluttar eksterna grunninum.

5) *47. Føroysk-Donsk orðabók:* Grunnurin verður umskipaður til

Fjernsyn inden fonden bliver afviklet.

3) *64. Museum i Hoyvik:* Fonden bliver lagt sammen med fond nr. 66 Reparationstilskud til fredede huse.

4) *78. Gammel præstegård, Nes:* Fonden bliver lagt sammen med nr. 66 Reparationstilskud til fredede huse.

§ 3.

Følgende fonde omorganiseres til eksterne fonde:

1) *11. Kulturfonden:* Fonden omorganiseres til en ekstern fond, og landskassefondens aktiver bliver overført til den eksterne fond.

2) *12. Fond til diverse kulturelle formål:* Fonden bliver lagt sammen med kulturfonden, og bliver således en ekstern fond. Fondens pengeformuer bliver overført til kulturfonden.

3) *20. Hotelfonden:* Fonden omorganiseres til en ekstern fond. Landskassefondens aktiver bliver oveført til den eksterne fond. Landsstyret fastsætter nærmere regler for udbetalinger fra fonden.

4) *28. Kirkebønnuren:* Fonden omorganiseres til en ekstern fond, og landskassefondens aktiver bliver overført til den eksterne fond.

5) *47. Færøsk-dansk ordbog:* Fonden omorganiseres til en ekstern fond.

eksteman grunn og peningaogn landskassagrunsins verður fluttar eksterna grunninum.

6) *60. Lán og studningur til bókaútgávu:* Grunnurin verður lagdur saman við mentanargrunninum og verður sostatt eksternur grunnur. Peningaogn grunsins verður flutt mentanargrunninum.

7) *75. Ídnaðarfremjandi endamál:* Grunnurin verður eksternur grunnur, og peningaogn landskassagrunsins verður fluttar eksterna grunninum. Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri útgjaldingum úr grunninum.

8) *81. Jarðabøkur og aðrar søguligar keldur:* Grunnurin verður eksternur grunnur og peningaogn landskassa grunsins verður fluttar eksterna grunninum.

9) *89. Grunnur tilretlaður brekaðum:* Grunnurin verður umskipaður til eksternan grunn. Ognir landskassagrunsins verða fluttar eksterna grunninum.

10) *90. Menningarhjálp:* Grunnurin verður umskipaður til eksteman grunn og ognir landskassagrunsins verða fluttar eksterna grunninum.

11) *92. Trygdargrunnur alivinnunar:* Grunnurin verður umskipaður til eksternan grunn.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

og landskassefondens pengeformue bliver overført til den eksterne fond.

6) *60. Lån og tilskud til bogudgivelser:* Fonden bliver lagt sammen med kulturfonden og bliver således en ekstern fond. Fondens pengeformuer bliver overført til kulturfonden.

7) *75. Erhvervsfremmende formål:* Fonden bliver en ekstern fond, og landskassefondens aktiver bliver overført til den eksterne fond. Landsstyret fastsætter nærmere regler for udbetalinger fra fonden.

8) *81. Historiske kilder:* Fonden bliver en ekstern fond, og landskassefondens pengeformue bliver overført til den eksterne fond.

9) *89. Fond for handicappede:* Fonden omorganiseres til en ekstern fond. Landskassefondens aktiver bliver overført til den eksterne fond

10) *90. Udviklingshjælp:* Fonden omorganiseres til en ekstern fond, og landskassefondens aktiver bliver overført til den eksterne fond.

11) *92. Opdrets sikkerhedsfonden:* Fonden omorganiseres til en ekstern fond.

§ 4.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Landsstýrið boðaði í samband við framløguna av fíggjarlógini fyri 1991 frá, at flestu landskassagrunnarnir fóru at vera avtiknir.

Við framlagda lógaruppskotinum verða 67 av teimum 92 landskassagrunnunum avtiknir, 14 verða verandi landskassagrunnar, meðan 11 halda fram sum eksternir grunnar.

Trupulleikarnir við grunnunum vóru fleiri:

Stórur partur av virksemi landskassans sást ikki á fíggjarlógini, bæði tí virksemið var fíggjað við lánum uttanum fíggjarlógina, men eisini varð tað fíggjað yvir grunnsjáttanir frá árunum frammanundan. Sostatt var tað sera torført at gera sær eina heildarmynd av, hvussu stórt virksemi landskassans kundi vera einstøku árini. Landsstýrið hevur nú lagt um til eina skipan, har allar útreiðslur standa á fíggjarlógini, uttan mun til um tær eru fíggjaðar við skatti, láni ella grunni.

Harumframt er onki samsvar millum bruttoupphæddina í grunninum og peningaogn grunsins. Stundum hevur landsstýrið ikki sett pening av, ið mótsvarar bruttoupphædd grunnsins, stundum er peningur fluttur yvir í landskassagjaldføri fyri at uppviga hall á øðrum økjum, og uppaftur í øðrum førum eru grunnarnir sjálvir yvirtrektir.

Sostatt ljóða grunnarnir vanliga uppá eina upphædd, sum er fleiri ferðir størri, enn tann fíggjarorka sum landskassin veruliga hevur.

Tað, at grunnarnir hava givið eina órealistiska mynd av fíggjarorku landskassans, hevur ofta ført til trýst á landsstýrið bæði frá stovnsleiðarum og áhugabólkum.

Av tí at eingin fíggjarorka liggur aftanfyri tølini í roknskapinum, hava krøvini frá áhugabólkunum verið fleiri ferðir størri enn møguleikar landsstýrisins at seta í verk byggingar og onnur tiltøk.

Ein annar trupulleiki við grunnunum var, at tá eingin veit hvussu stórt virksemi landskassans verður í einum ári, so er ógjørligt frammanundan at vita, hvussu stór gjaldførisfrágongdin úr landskassanum fer at vera í einum komandi fíggjarári, og bar tí ikki til at gera gjaldførisætlan.

Av tí at stórur partur av útreiðslum landskassans lá goymdur í ymsum grunnum, var heldur ikki gjørligt at gera eina langtíðarfíggjarætlan, ið umfatað alt landskassavirksemi.

Við tí nýggju skipanini, har allar fløgurnar standa á fíggjarlógini er bøtt munandi um møguleikarnar at gera haldgóða gjaldførisætlan og langtíðarfíggjarætlan.

Teir nógvu grunnarnir, flestu av teimum við fleiri peningastovnakonti, hava gjørt tað torført, at gjørt innlánsavtalur við peningastovnarnar. Tískil eru bert fáar tílíkar avtalur um innistandandi hjá landskassanum.

Flestu fyrireikingarnar til nýggju skipanina eru nú gjørdar. Tær týdningarmestu eru:

1. Ætlaðar fløgur og játtaðir fløgustudningar standa nú beinleiðis á fíggjarlógini.

2. Heimildir landsstýrisins at veita lán standa í sjálvari fíggjarlógini.
3. Rakstrarútreiðslur, sum vóru veittar úr ymsum grunnum í 1990, eru nú í flestu førum settar beinleiðis á fíggjarlógina.
4. Inngjøld, tvs. rentur og avdráttir av útlánum landskassan eru við á fíggjarlógini, og við tað at omanfyrinevndu punktini 1, 2 og 3 eru framd, er tað nú gjørligt at gera eina gjaldførisætlan, og harvið kann eisini lánitørvurin uppgerast. Tó eru trupulleikar við teimum grunnum, ið tað enn ikki hevur verið gjørligt at avtaka.

Sum nevnt omanfyri verða nakrir grunnar verandi landskassagrunnar. Teir eru:

5. Byggi- og rakstrargrunnur postverksins.
10. Apoteksgrunnurin.
26. Nýggj Sjónleikarhús.
27. Havrannsóknarskip.
29. Yvirtøka av Sermálum.
30. Byggigrunnur, Strandferðslan.
37. SU-lærlingastudningur.
41. Útbúgvingargrunnurin.
42. Studningur til lærlingar.
45. Heilsufrøðilig Starvsstova.
54. Nýtt Vaktarskip.
66. Umvælingarstudningur til friðað hús.
82. Skjalasavn.
86. Kirkjan í Keypmannahavn.

Ætlanin er at tá nakað er fráliðið, skulu hert fimm landskassagrunnar verða eftir:

5. Byggi- og rakstrargrunnur postverksins.
10. Apotcksgrunnurin.
30. Byggigrunnur strandsferðslunnar.
41. Útbúgvingargrunnurin.
66. Umvælingarstudningur til friðað hús.

Hinir grunnarnir hava allir eitt tíðaravmarkað endamál, og tá hetta endamál er nátt, t.d. ein bygging er framd, so verður grunnurin avtikin.

Nakrir grunnar halda fram sum eksternir grunnar. Hesir eru:

11. Mentanargrunnurin.
12. Grunnur til mentanarlig endamál.
20. Gistingarhúsgrunnurin.

28. Kirkjubøsmúrurin.
47. Føroysk-donsk orðabók.
60. Láns- og studningsgrunnurin til bókaútgávu.
75. Íðnaðarfremjandi endamál.
81. Jarðarbøkur og aðrar søguligar keldur.
89. Grunnur tilætlaður brekaðum.
90. Menningarhjálp.
92. Trygdargrunnur alivinnunar.

Orsøkin til at hesir grunnar halda fram sum eksternir grunnar er, at talan er um endamál, har komið verður fram til eina loysn eftir fleiri árum. Í øðrum førum má sigast, at ætlanin ikki hevur verið, at landsstýrið einsamalt skal hava ræði yvir fæi grunsins, og tí verður hildið at rættast er at gera grunnin til eksternan grunn.

Fylgjandi grunnar verða gjørdir um til rakstrarstøð á fíggjarlógini:

9. Berghol og brúgvagerð.
17. Havnagerð.
24. Útróðrarstøðir.
40. Játtan til lendingar.
84. Grunnur til burturbeining av akførum.

Viðmerkjast skal, at allir grunnar verða ikki uppgjørdir alt fyri eitt. Har tøkilig projekt eru í gongd, verður bíðað við at gera grunnin upp inntil byggingin er liðug.

Hava grunnarnir veitt lán til ymsar lántakarabólkar, eru hesi lán í løtuni ogn hjá grunnunum. Við framlagda lógaruppskoti gerast lánini í staðin ogn hjá landskassanum.

Hevur grunnurin álikið sær skyldur, t.d. at gjalda studning í samband við eina havnabygging eitt áramál fram í tíðina, so koma hesar skyldur at áliggja landskassanum so skjótt grunnurin er avtikin.

Fastar ognir og fíggjarogn, t.d. innistandandi í peningastovnum, sum í løtuni er ogn hjá grunnunum, verður sambært framlagda uppskoti ogn hjá landskassanum.

Samanumtikið fer ein landskassaroknskapur, har bert fáir grunnar eru, men har allar íløgur, íløgustudningar, rakstrarútreiðslur og útlánsheimildir standa á fíggjarlógini, at vera eitt munandi betri stýringsamboð hjá bæði politisku myndugleikunum og umsitingini, enn skipanin frammanundan.

Harumframt fer nýggja skipanin at geva eina greiðari mynd av bæði rakstri og fíggjarstøðu landskassans, av tí at bæði fleiri og betri upplýsingar siggjast beinleiðis í fíggjarlógini. Hetta fer at geva bæði almenningi, politiskt valdum um-

boðum og útlendskum lánveitarum, munandi betri kunnleika til gongdina í føroyskum búskapi enn frammandundan.

Viðmerkingar til einstøku grunnarnar:

1. *Eftirlønargrunnur:* Grunnurin er óvirkin og er yvirtrektur við umleið hálvari milliún.
2. *Kirkjukassin:* Grunnurin er so lítil, at hann ongan praktiskan týdning hevur. Peningaogn grunsins verður flutt kirkjugrunninum, ið er ein eksternur grunnur.
3. *Umsitingarhús:* Byggingin er um at vera liðug, og hevur meirnýtslan harumframt fingið eitt byggirakstrarstað á fíggjarlógini.
4. *Nýtt tollpakkhús:* Byggingin er liðug.
5. *Byggi- og rakstrargrunnur postverksins:* Grunnurin verður verandi landskassagrunnur.
6. *Eftirlønargrunnur, kapital:* Grunnurin skuldi vera eftirlønargrunnur hjá lærarum.Hetta endamál stendur beinleiðis á fíggjarlógini. Grunnurin er yvirtrektur.
7. *Sjónvarpsgrunnur, tollur:* Grunnurin hevur havt inntøkur og útreiðslur. Bæði inntøkur og útreiðslur skulu nú standa beinleiðis á fíggjarlógini. Av tí at Sjónvarp Føroya ikki longur kann bóka útreiðslur á grunnin, varð játtanin økt frá 3 mió. kr. til 3,5 mió. kr. árliga.
8. *Útvarpsgrunnur:* Byggingin er liðug.
9. *Berghol og brúgvagerð:* Grunnurin er óneyðugur. Landsverkfrøðingsstovnurin kann longu nú bóka beinleiðis á rakstrarstøð.
10. *Apoteksgrunnurin:* Grunnurin verður verandi landskassagrunnur.
11. *Mentanargrunnurin:* Grunnurin verður eksternur grunnur.
12. *Grunnur til ymisk mentanarlig endamál:* Grunnurin verður eksternur grunnur, og verður lagdur saman við Mentanargrunninum.
13. *Fornminnissavn:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.
14. *Útvarpssendistøðir:* Byggingin er liðug. Rakstrarstað er á fíggjarlógini til at gjalda skuld til Telefonverkið í samband við byggingina.
15. *Sjónvarpið:* Sjónvarp Føroya fær útgoldið peningaogn grunsins. Útbyggingar av sjónvarpinum skulu framyvir standa á fíggjarlógini.
16. *Norðurlandahús:* Rakstrarstað til endamálið er á fíggjarlógini.
17. *Havnagrunnurin:* Rakstrarstað skal gerast til byggingarnar. Landsverkfrøðingsstovnurin kann longu nú bóka beinleiðis á rakstrarstøð.
18. *Skúla & Íróttargrunnur:* Studningar til endamálið standa á fíggjarlógini.
19. *Lánigrunnur til Íróttarumlegg:* Studningar til endamálið standa á fíggjarlógini.

20. *Gistingarhúsgrunnurin:* Grunnurin verður eksternur grunnur.

21. *Nýtt løgtingshús:* Grunnurin er brúktur til umsitingarhús í Tinganesi. Henda bygging er um at vera liðug.

22. *Fríðargrunnurin:* Grunnurin hevur ikki verið virkin.

23. *Endurnýggjan av skipaflotanum:* Rakstrarstøð til endamálið eru á fíggjarlógini.

24. *Umróðrarstøðir:* Rakstrarstað á fíggjarlógini verður gjørt til endamálið, og neyðuga upphæddin verður sett á fíggjarlógina.

25. *Grunnur til fiskinoyndir í fremmandum høvnum:* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

26. *Nýggj Sjónleikarhús:* Byggigrunnurin verður varðveittur inntil viðurskiftini viðvíkjandi bygging av nýggjum sjónleikarhúsi eru avgreidd.

27. *Havrannsóknarskip:* Grunnurin verður varðveittur, inntil viðurskiftini viðvíkjandi bygging av nýggjum havrannsóknarskipi eru avgreidd.

28. *Kirkjuhøvúðurin:* Av tí at grunnurin hevur fingið sjálvbodnar gávur, verður grunnurin eksternur grunnur. Landsstýrið setur nærri reglur fyri nýtslu úr grunninum.

29. *Yvirtøka av sernámum:* Grunnurin verður varðveittur inntil ígongdverandi arbeiði við yvirtøkum er liðugt.

30. *Byggigrunnur, Strandferðslan:* Grunnurin verður varðveittur sum landskassagrunnur til bráfeingis loysnir hjá Strandfaraskipum Landsins.

31. *Asfalteringsgrunnur kommununa:* Tær kommunur, ið hava pening til góðar í grunninum, fáa hann útgoldnan, áður enn grunnurin verður avtikin.

32. *Flogvøllurin:* Grunnurin er yvirtrektur við sløkum trinum milliónum. Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

33. *Byggigrunnur, Bileftirlitið á Bygd:* Byggingin er liðug.

34. *Byggigrunnur, Bileftirlitið Tórshavn:* Byggingin er liðug.

35. *Bileftirlitið-Hálkubreyt:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

36. *Móti tapi uppá lán og veðhald:* Grunnurin er yvirtrektur við umleið 290 mió. kr. Rakstrarstað er sett á fíggjarlógina til endamálið.

37. *S.U. Lærlingastaðningar:* Grunnurin hevur leingi verið óvirkin.

38. *Landsbanki Føroya:* Stovnurin fær í framtíðini sjálvstøðugan rakstur.

39. *Spesialskúlin:* Byggingin er liðug.

40. *Lendingagrunnurin:* Landsverkfrøðingsstovnurin kann longu nú bóka beinleiðis á rakstrarstøð.

41. *Útbúgvingargrunnurin:* Verður varðveittur sum landskassagrunnur.

42. *Studningur til lærlingar:* Grunnurin hevur verið óvirkin í nógv ár.

43. *Náttúrugripasavn:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

44. *Fróðskaparsetur:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

45. *Heilsufrøðilig Starvsstova:* Grunnurin verður varðveittur inntil viðurskiftini viðvíkjandi bygging av Heilsufrøðiligari Starvsstovu eru avgreidd.

46. *Bókasøvn, nýstovnan:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

47. *Útgáva av føroysk-danskari orðabók:* Grunnurin verður eksternur grunnur. Landsstýrið setir nærri reglur fyri virki grunsins.

48. *Ansingar-og Røktarheim:* Byggirakstrarstøð til endamálið eru á fíggjarlógini.

49. *Vardar íbúðir til pensionistar:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

50. *Fiskiroyndir:* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

51. *Kommunali lánigrunnurin:* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið. Landsstýrið kann sambært lógaruppskotinum framvegis veita fígging til kommunur innanfyri teir karmar í settir eru á fíggjarlógini.

52. *Ílegging til S.E.V.:* Grunnurin hevur verið óvirkin í mong ár.

53. *Orkugrunnur (SEV):* Útlán til endamálið(orkuprosjekt), skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

54. *Nýtt Vaktarskip:* Grunnurin verður varðveittur inntil viðurskiftini viðvíkjandi bygging av nýggjum vaktarskipi eravgreidd.

55. *Føroyahús, Keypmannahavn:* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

56. *Samferðsluráðið:* Grunnurin hevur ikki verið virkin. Útreiðslur til endamálið skulu standa á fíggjarlógini.

57. *Sjúkrahúsbygging:* Byggirakstrarstøð eru til endamálið á fíggjarlógini. Grunnurin er yvirtrektur við 19,5 milliónum.

58. *Dieselmotorsimulator (Maskinskúlin):* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

59. *Bókasavnsgrunnurin:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

60. *Lán og studningur til bókaútgávu:* Grunnurin verður eksternur grunnur og verður lagdur saman við mentanargrunninum.

61. *Fólkapensiónsgrunnur:* Grunnurin er yvirtrektur við stívliga trimum millión um krónum. Útreiðslur til bygging av ellis- og røktarheimum standa longu nú beinleiðis á fíggjarlógini.

62. *Sjómansskúli:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

63. *Ungdóms & bygdahús:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

64. *Savn í Hoyvík:* Grunnurin verður lagdur saman við grunni nr. 66. "Umvælingarstudningur til friðað hús".

65. *Nemingaheim:* Byggirakstrarstað er á fløguætlan landsstýrisins.

66. *Umvelingastudningur til friðað hús:* Grunnurin verður varðveittur, av tí at útreiðslurnar til endamálið eru sera ymiskar frá ári til ár.

67. *Læraraskúli:* Byggingin er liðug.

68. *Maskinskúli:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

69. *Tekniskir Skúlar:* Byggirakstrarstað er á fløguætlan landsstýrisins til endamálið.

70. *Sjóvinnuskúli:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

71. *Fiskiídnaðarskúli:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

72. *Studentaskúlaheim:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

73. *Grunnur til heilsumiðstøðir:* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

74. *Íbúðargrunnur:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

75. *Ídnaðarfremjandi endamál:* Grunnurin verður eksternur grunnur. Landsstýrið ger nærri reglur fyri virki grunsins.

76. *Studenta-HF Skeið Eysturoy:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

77. *Studentaskúli, Hoydølum:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

78. *Gomul Prestahús á Nesi:* Grunnurin verður lagdur saman við grunni nr. 66: *"Studningur til friðað hús"*.

79. *Fiskiransóknarstovan:* Grunnurin er yvirtrektur við 18,5 miljónum krónum. Byggingin er liðug.

80. *Bókasavn í Klaksvík:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjlógini.

81. *Jarðarb. og Aðrar Søguligar Keldur:* Grunnurin verður eksternur grunnur. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri virki grunsins.

82. *Skjalasavn:* Grunnurin verður varðveittur inntil viðurskiftini viðvíkjandi bygging av nýggjum landsskjalasavni er greidd.

83. *Oljugrunnur:* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

84. *Grunnur til burturbeining av akførum:* Rakstrarstøð verða gjørd á fíggjarlógini, bæði til inntøkur og útreiðslur grunsins.

85. *Byggigrunnur til serforsorg:* Byggirakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

86. *Kirkjan í Keypmannahavn:* Grunnurin verður varðveittur inntil viðurskiftini viðvíkjandi bygging av føroyskari kirkju í Keypmannahavn eru greidd.

87. *Hjálpargrunnur móti alkoholmisnýtslu:* Rakstrarstað er á fíggjarlógini til endamálið.

88. *Aðrir Studenta- & HF skúlar:* Útreiðslur til endamálið skulu í framtíðini standa á fíggjarlógini.

89. *Grunnur tilfeldaður brekaðum:* Grunnur verður eksternur grunnur. Landsstýrið hevur ásett reglur fyri virksemi grunsins.

90. *Menningarhjálp:* Grunnurin verður eksternur grunnur. Landsstýrið setir nærri reglur fyri virki gronsins.

91. *Grunnur til fiskiskipaupphøgging:* Rakstrarstað er til endamálið á fíggjarlógini. Grunnurin verður ikki avtikin fyrr enn seinastu upphøggingarnar eru avgreiddar.

92. *Tryggdargrunnur alivinnunar:* Grunnurin verður eksternur grunnur. Landsstýrið setir nærri reglur fyri virki gronsins.

Yvirlit yvir fíggjarstøðuna hjá einstøku grunnunum er hjálagt, og somuleiðis stutt yvirlit yvir peningaogn, yvirtrekk og ognir annars hjá grunnunum tilsamans og hjá einstøku grunnunum.

Felagsálit

í

Løgtingsmáli nr. 57/1991: Avtøka av landskassagrunnum, og løgtingsmáli nr. 58/1991: Broytingar í ymsum løgtingslógum í sambandi við avtøku av landskassagrunnunum.

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 10. december 1991 og eftir 1. viðgerð 15. december 1991 beint í Fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini og roynt hevur verið at fingið tey so væl lýst sum gjørligt.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur verið á fundi fyri at svara spurningum frá nevndini um hesar avtøkur. Um spurningin, um teir eksternu grunnarnar vísti landsstýrismaðurin á viðmerkingarnar til lógaruppskotið, ið serliga verður tilskilað:

"Orsøkin til, at hesir grunnar halda fram sum eksternir grunnar, er, at talan er um endamál, har komið er fram til eina loysn eftir fleiri árum. Í øðrum førum má sigast, at ætlanin ikki hevur verið, at landsstýrið einsamalt skal hava ræði yvir fæi grunnsins, og tí verður hildið, at rættast er at gera grunnin eksternan grunn."

Tann 31. august 1990 legði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Ivan Johannesen fram løgtingsmál nr. 6/1990: Fíggjarløgtingslóg fyri 1990 fram á ting.

Í viðmerkingunum til tað fíggjarlógaruppskotið vísti landsstýrið, ið tá sat, á nakrar tekniskar broytingar við fíggjarlógini. Høvuðsbroytingin var avtøka av flest øllum landskassagrunnum. Fylgjandi varð skrivað í einum broti av viðmerkingunum til tað fíggjarlógaruppskotið:

"Allir landskassagrunnar, uttan nøkur heilt fá undantøk, vórðu avtiknir, og verður tí ikki talan um játtanir úr grunnntum longur. Orsøkirnar til, at grunnarnir eru avtiknir, eru fleiri: Tað hevur higartil ikki verið gjørligt við ársbyrjan at vita, hvussu stórt virksemið fór at verða framt yvir grunnajáttanir, og sostatt hevur eis

ini verið ógjørligt frammanundan at vita, hvussu nógv gjaldførisfrágongdin úr landskassanum fór at verða í einum komandi fíggjarári. Tað skal undirstrikast, at hetta sama er galdandi, sjálvt um grunnajáttanirnar eru hildnar."

Framvegis verður sagt, at skulu politiskir myndugleikar hava nakran møguleika at gera sær eina mynd av, hvussu stórt almenna virksemið verður í øðrum londum. Allar ætlaðu fløgnútreiðslur í 1992 ella fløgukarmar standa tí á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1991.

Tað hevur higartil verið ógjørligt at siggja, hvussu stór nýtslan í landinum er í einum fíggjarári, av tí at ein munandi partur av rakstrinum er nýtsla úr grunnum. Hesum er Fíggjarnevndin samd í og vísir annars á álit í løgtingsmál nr. 39/1991: Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum, har millum annað verður sagt:

"Alt virksemi landskassans skal avspeglast í fíggjarlógini (ella eykafíggjarlóg), t.v.s. at peningur bert kann verða nýttur, tá tað beinleiðis stendur á fíggjarlógini ella eykafíggjarlóg. Hetta er eisini galdandi fyri tær støku lánsheimildirnar, sum eru í gildi eins og fyri tey lán, sum eru tikin og enn ikki nýtt."

Avleiðingin av, at skipanin við grunnunum dettur burtur er at allar fløkiligar byggilætlanir skulu við á fíggjarlógina.

Byggingin fær so eitt rakstrarstað, har tann, ið hevur ávísingarheimildina, hevur ábyrgdina av, at kostnaðurin ikki fer upp um ætlaðu upphæddina.

Sum áður sagt, so vísti undanfarna landsstýrið á í fylgiskrivi til fíggjarlógina fyri 1991, at allir landskassagrunnar uttan nøkur heilt fá undantøk verða avtiknir, og verður tí ikki játtað úr grunnum longur.

Fíggjarnevndin gjørdi tá vart við í álitinum til fíggjarlógina 1991, at landskassagrunnarnir neyvan kundu avtakast, við at skriva hetta í viðmerkingarnar, men at her mátti gerast eitt ávíst lógararbeiði í samband við avtøku av landskassans grunnum.

Hetta hevur nú landsstýrið gjørt, við at leggja fram tvey uppskot, í samband við avtøku av landskassans grunnum.

Løgtingsmál nr. 57/1991: Avtøka av landskassagrunnum - ger greitt, hvørjir grunnar skulu varðveitast og hvørjir skulu takast av.

Landsstýrið sigur, at við framlagda lógaruppskotinum verða 67 av teimum 92 landskassagrunnunum avtiknir, 14 verða verðandi landskassagrunnar, meðan 11 halda fram sum eksternir grunnar.

Løgtingsmál nr. 58/1991: Broytingar í ymsum løgtingslógum í sambandi við avtøku av landskassagrunnunum - er fylgilóg í samband við avtøku av meginpartinum av landskassagrunnum.

Í hesi lóg verða gjørdar tær neyðugu broytingarnar í ymsum lógum. Landsstýrið sigur, at í flestu førunum er talan um, at lógirnar verða broyttar soleiðis, at

útreiðslurnar í framtíðini skulu gjaldast úr landskassanum í staðin fyri ymsum grunnum. Samanumtikið kann sigast, at við hesum báðum tingmálum verður sum frálíður ætlanin, at einans 5 landskassagrunnar verða eftir. Hesir eru:

– Byggi- og rakstrargrunnur postverksins,
– Apoteksgrunnurin,
– Byggigrunnur Strandferðslunnar,
  Úbúgvingargrunnurin og
– Umvælingargrunnur til at friða hús.

Við hesum viðmerkingum mælir meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Finnbogi Arge og Flemming Mikkelsen) til at samtykkja løgtingsmál nr. 57/1991: Avtøka av landskassagrunnum og løgtingsmál nr. 58/1991: Broytingar í ymsum løgtingslógum í sambandi við avtøku av landskassagrunnunum.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) setir eingi uppskot fram.

58. Broytingar í ymsum løgtingslógum í sambandi við avtøku av landskassagrunnunum

Uppskot

til

Løgtingslóg um broytingar í ymsum løgtingslógum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Viðmerking til § 8, pkt. 3 um gjald av sjónvarpsmóttakarum verður strikað.

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum v.m., við seinni broytingum verður gjørd

Lagtingslov om ændringer i forskellige lagtingslove.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgift med senere ændringer foretages følgende ændring:

Anmærkning til § 8, pkt. 3 om afgift af fjernsynsmodtagere udgår.

§ 2.

I lagtingslov nr. 102 fra 1. oktober 1986 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.m. med senere ændringer føre-

henda broyting:

§ 13 a verður orðað soleiðis:

"*Gjald fyri burturbeining.*

Til burturbeining av teimum í §§ 3, 4, 5, 7a, 7b, 8 og 9 nevndu akførum verður landsstýrinum heimilað at áseta eitt gjald, sum verður rindað við fyrstu skráseting av akfarinum. Nærri reglur fyri útgjalding fyri burturbeining verða ásettar av Føroya Landsstýri."

§ 3.

Í løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 um serligt gjald á brennolju verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Inntøkur av gjaldi sambært hesi lóg fara í landskassan."
2) Stk. 2 og 3 í § 3 verða strikað.

§ 4.

Í løgtingslóg nr. 56 frá 9. juni 1988 um megin-, fólka- og skúlabókasøvn verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 12 verður orðað soleiðis:
"Peningur til endamálið skal játtast á fíggjarløgtingslógini."
2) § 13 verður orðað soleiðis:
"Játtanin verður umsitin av einum stýri við 3 limum, sum eru bókasavnsstjórin, ein, sum bókasavnsráðið velur, og ein limur, sum Landsskúlafyrisitingin velur."

§ 5.

Í løgtingslóg nr. 48 frá 7. juni 1979 um orkuráð og orkugrunn verður gjørd henda broyting:

tages følgende ændring:

§ 13 a affattes således:

"*Bortskaffelsesafgift.*

Til bortskaffelse af de i §§ 4, 5, 6, 7a, 7b, 8 og 9 omtalte køretøjer bemyndiges landsstyret til at fastsætte en afgift, som betales ved første registrering af køretøjet. Nærmere regler for udbetaling for bortskaffelse fastsættes af Færøernes Landsstyre."

§ 3.

I lagtingslov nr. 99 fra 1. oktober 1986 om særlig afgift på brændselsolie m.v. foretages følgende ændringer:

1) § 3, stk. 1, affattes således:
"Indtægter pålagt ifølge denne lov tilfalder landskassen."
2) § 3, stk. 2 og 3 udgår.

§ 4.

I lagtingslov nr. 56 af 9. juni 1988 om central-, folke- og skolebiblioteker foretages følgende ændringer:

1) § 12 affattes således:
"Midler til formålet skal bevilges på finanslagtingsloven."
2) § 13 affattes således:
"Bevillingen administreres af en bestyrelse på 3 medlemmer, der er bibliotheksdirektøren, et medlem, som biblioteksrådet vælger, og et medlem, som undervisningsdirektoratet vælger."

§ 5.

I lagtingslov nr. 48 af 7. juni 1979 om energiråd og energifond foretages følgende ændring:

§ 2 verður orðað soleiðis:

"Eru landsstýrið og Orkuráð samd um, at ávísar metingar, kanningar ella royndir eiga at verða framdar, verða útreiðslurnar, ið standast av hesum tiltøkum, goldnar úr landskassanum. Játtan til endamálið skal fáast til vega á árligu fíggjarløgtingslógini."

§ 2 affattes således:

"Er landsstyret og energirådet enige om, at visse vurderinger, undersøgelser eller forsøg bør finde sted, afholdes udgifterne hertil af landskassen. Bevilling til formålet tilvejebringes på den årlige finanslagtingslov."

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar

Í samband við at flestu landskassagrunnarnir vera avtiknir, er neyðugt at broyta ymsar lógir. Í flestu førum er talan um, at lógirnar verða broyttar soleiðis, at útreiðslurnar í framtíðini skulu gjaldast úr landskassanum í staðin fyri úr ymsum grunnum.

Viðmerkingar til ymsu greinarnar

Til § 1. Játtan til byggingar og umbyggingar og innkeyp av rakstrargøgnum hjá Sjónvarpi Føroya hava higartil verið veitar úr grunni. Ein partur av innflutningsgjaldinum av sjónvarpstólum er farið í henda grunn. Við lógarbroytingini koma bæði inntøkur og útreiðslur at standa á sjálvari fíggjarlógini.

Til § 2. Játtan til burtudbeining av akførum er higartil veitt úr grunni. Hinvegin eru inntøkur til grunnin, ið stava frá einum serligum avgjaldi. Við lógarbroytingini koma bæði inntøkur og útreiðslur at standa á fíggjarlógini.

Til § 3. Serliga avgjaldið á olju er higartil farið í ein grunn. Inntøkurnar frá oljugjaldinum eru longu við á fíggjarløgtingslógini fyri 1991.

Til § 4. Í verandi lóg er lagt upp til, at 10 prosent av árligu játtanini til megin-, fólka- og skúlabókasøvn skulu játtast í ein grunn til felags bókasavnsuppgávur og serliga bókasavnstænastu. Hetta er tó ikki gjørt. Við lógarbroytingini skulu útreiðslur til hesi endamál setast á fíggjarlógina.

Til § 5. Við verandi skipan er ein grunnur til hesi endamál. Sambært lógini skulu útreiðslur til rakstur av orkuráðnum gjaldast úr landskassanum. Kortini vóru hesar útreiðslur goldnar úr grunninum fram til fíggjarárið 1991, tá hetta varð rættað soleiðis at útreiðslurnar nú eru settar á sjálva fíggjarlógina. Við lógarbroytingini skulu útreiðslur til metingar, kanningar og royndir somuleiðis játtast á fíggjarlógini. Rakstrarstað til hetta endamál er longu sett á fíggjarlógina 1991.

59. Bústovnurin við Hoyvíksvegin fyri talibrekað børn av bygd

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at finna útvegir fyri, at bústovnurin við Hoyvíksvegin fyri talibrekað børn á bygd, sum tey avvarðandi og børnini eru glað fyri, heldur fram.

Viðmerkingar

Bústovnurin við Hoyvíksvegin hevur í 23 ár ligið undir skúlanum á Trøðni og verið rikin saman við skúlanum.

Tá ið landsstýrið yvirtók skúlan á Trøðni og legði hann undir landsskúlafyrisitingina, var semja um, at næmingaheimini skuldu verða undir almannaverkinum.

Tað kemur tí dátt við at frætta í fjølmiðlunum, at skúlamyndugleikarnir ætla at niðurleggja skúlaheimið við Hoyvíksvegin fyri talibrekað børn og kanska flyta børnini út á næmingaheimið á Argjum, sum ikki kann rúma bæði teimum, sum frammanundan eru har, og teimum, sum í dag eru á bústovninum við Hoyvíksvegin.

Foreldrini hava mótmælt, at lagt verður á, har garðurin er lægstur, og biðja um, at tann peningur framhaldandi verður játtaður, ið neyðugur er til at reka bústovnin.

Her búgva børn av bygd, sum fólkaskúlin ikki enn er førur fyri at hýsa og geva tann íblástur, ið neyðugur er, og foreldrini hava verið sera glað fyri tann anda, sum bústovnurin hevur verið rikin í. Tey ynskja øll, at hann heldur fram.

Tá ið samgonguflokkarnir, ið manna landsstýrið ikki vildu atkvøða fyri, at fyrispurningur hesum viðvíkjandi verður svaraður, verður hetta uppskot til samtyktar sett fram.

60. Samskifti millum borgaran og tað almenna

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at taka neyðug stig til at samskifti frá tá almenna til borgaran gerst betri, soleiðis, at hesin í sambond við fyrispurningar, umsóknir v.m. í minsta lagi altíð fær eitt svar, innan tríggjar vikur eru gingnar.

Viðmerkingar

Talið av almennum stovnum hevur tey mongu seinastu árini støðugt verið vaksandi, soleiðis, at í dag hevur ein stórur partur av borgarum landsins beinleiðis ella óbeinleiðis samskifti við ein ella fleiri av hesum stovnum.

Samskifti borgaranna við hesar stovnar gevur seg til kenna á ymsan hátt - v.m. fyrispurningum, áheitanum og umsóknum.

Sjálvandi er tað ymiskt frá stovn til stovn hvussu málsviðgerðir fara fram, hvussu mál verða avgreidd og nær avvarðandi borgari verður kunnaður um avgerðir. ið tiknar eru.

Tó man tað mongum hava kenst sum sannroynd, at fyrispurningar, áheitanir, umsóknir v.m. vórðu sendar og at long tíð gekk í ringasta føri ongantíð - áðrenn nakað hoyrdist aftur.

Sjálvt um ávís mál krevja drúgva tíð til endaliga avgreiðslu, má tað metast sum rættur borgarans at frætta málinum viðvíkjandi innan rímuliga tíð - t.d. áðrenn 3 vikur vóru gingnar.

Als ikki at frætta, átti ikki at komið fyri, tá havast má í huga at almennu stovnarnir - landsstýrið íroknað - eru til fyri borgarans skuld og ikki øvugt.

Til tess at betra um tænastustøðið, átti landsstýrið at fingið skipað viðurskifti á almennum stovnum, soleiðis at borgarar landsins altíð í minsta lagi fingu svar í samskiftinum við hesar stovnar, áðrenn ov long tíð var fráliðin.

Uttan stórvegis hóvasták áttu hesi viðurskifti at komið í rættlag og í teirri vón verður eisini uppskotið lagt fram.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 60/1991: Samskifti millum borgara og tað almenna.

Málið er lagt fram av Tordur J. Nielsen tann 16. december 1991 og undir 1. viðgerð 29. januar 1992 beint í rættarnevndina.

Málið snýr seg um samskifti millum tað almenna og borgarar. Nevndin hevur viðgjørt málið og er komin til ta niðurstøðu, at tað er sjálvsagt, at almennir stovnar veita borgarum sínum so góða og sømiliga tænastu sum yvirhøvur møguligt. Somuleiðis heldur nevndin tað vera ein sjálvsagdur lutur, at øll, tá vanda sær til tað almenna, fáa svar innan rímiliga tíð.

Nevndin heldur, at nógvir almennir stovnar yvirhøvur tíbetur lúka hesar treytir, men at tað kunnu vera stovnar, sum í ávísan mun ikki gera tað. Nevndin kann út frá hesum taka undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

61. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1992

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á 13. NAFO-ársfundinum í september 1991 um regulering av fiskiskapinum á sátmálaøkinum í 1991.

Viðmerkingar

13. ársfundurin hjá NAFO var haldin í Dartmouth, Nova Scotia, Kanada í døgunum 9. - 13. september 1991 undir leiðslu av Kjartan Hoydal (vegna Danmark, Føroyar og Grønland).

Fundurin viðgjørdi frágreiðingina frá vísindaligu ráðunum (Scientific Council) um fiskastovnarnar í útnyrðingspartinum av Atlantshavinum. Í frágreiðingini verður m. a. greitt frá:

Toskur í NAFO øki 1 (t.e. undir Vesturgrønlandi)

Heildarveiðan í 1988-90 var ávikavist 62.000, 108.000 og 60.000 tons. Ein sera góður árgangur kom undan í 1984, og var hann støðið undir tí góða fiskiskapinum í 1988 og 1989. Tað hevur tó víst seg, at hesin árgangur í stóran mun er flut-

tur úr grønlendskum sjógvi, helst til Íslands. Veiðan í 1990 var mest av 5-ára gomlum toski, t.e. 1985-árgangurin, og verður hann eisini í stóran mun hildin at vera av íslendskum uppruna og væntast tí at flyta sama veg. Árgangirnir 1986-90 verða allir mettir at vera lítlir.

Veiðiútlitini eru tí ikki góð. TAC fyri 1991 er sett til 90.000 tons, men nógv bendir á, at veiðan bert verður 9.000 tons, og sama kann helst sigast um 1992. 1985-árgangurin flytur tó kanska ikki so skjótt, sum fyrstu tekin vóru um, og um so er, verður veiðan nakað støri.

Toskur í NAFO økjum 2J og 3KL (t.e. undir Labrador og Newfoundlandi)

Hesin stovnur verður sum so ikki stovnsmettur í NAFO, men innanhýsis í Kanada, tí størsti parturin av honum er á Kanadiskum sjóøki. Men hvørt ár verður í NAFO mett um, hvussu stórur partur av honum er uttan fyri 200 fjórðinga markið hjá Kanada, og er hetta í meðal umleið 1 % í vekt. Býtt upp á øki: 38% í 2J, 33% í 3K og 29% í 3L.

Toskur í NAFO økjum 3NO (t.e. á Grand Bank)

Veiðan í 1988-90 var ávikavist 43.000, 33.000 og 40.000 tons, ið serliga fyri 1990 er væl minni enn TAC. Eingin verulig stovnsmeting kundi gerast, men nógv bendir á, at stovnurin er illa fyri. Tilrádda TAC'ið fyri 1991 er 13.600 tons, og mælt varð til, at veiðan í 1992 ikki má fara upp um hetta.

Toskur í NAFO øki 3M (t.e. á Flemish Cap)

Fráboðaða veiðan í 1988-90 var ávikavist 2.000, 1.000 og 2.000 tons. Mett verður tó, at rættari veiðutøl eru ávikavist 35.000, 40.000 og 32.000 tons. Eingin verulig stovnsmeting kann gerast í løtuni av hesum stovni, tí at veiðutølini eru so óviss, og bert lítil partur av veiðuni tí verður kannaður. Yvirlitstrolingar og føroyska línuveiðan benda tó á, at stovnurin í 1987 var á ógvuliga lágum støði. Árini 1988-90 vaks hann nakað aftur orsakað av hampuliga góðum árgangum í 1985 og 1986, men vegna tað alt ov høga veiðitrýstið í 1988-90 verður ikki væntað, at hesin vøkstur heldur fram, heldur tvørturímóti. Gýtingarstovnurin varð mettur at vera á sera lágum støði í seinna parti av 1990. Veiðan hjá portugisiskum og sponskum trolarum og garnabátum minkaði nógv eftir fyrra hálvár 1990, og sama var galdandi fyri 1991. Hetta letur til eisini vera galdandi fyri ta føroysku línuveiðuna í 1991. Tekin eru ikki um nakran góðan árgang eftir 1986.

Eingin beinleiðis ráðgeving (TAC, veiðubann o.a.t.) varð givin.

Svartkalvi í NAFO økjum 0 og 1

Veiðan í 1988-90 var ávikavist 10.000, 9.000 og 19.000 tons.

Orsøkin til vøksturin frá 1989 til 1990 er økt kanadisk og føroysk trolveiða. Eingin verulig stovnsmeting varð gjørd, men yvirlitstrolingar benda á, at stovn-

urin er støðugur. Mælt varð til, at TAC fyri 1992 skal vera 25.000 tons eins og í 1991.

Svartkalvi í NAFO økjum 2 og 3KLM

Veiðan í 1988-90 var ávikavist 19.000, 19.000 og 47.000 tons.

Vøksturin frá 1989 til 1990 stavar serliga frá einum nýggjum fiskiskapi á djúpum vatni í øki 3LM. Eingin verulig stovnsmeting varð gjørd, tí ov lítil kunnleiki er um, hvussu svartkalvi flytur, men yvirlitstrolingar benda á, at stovnurin hevur verið støðugur seinastu árini, tó ikki so stórur sum miðskeiðis í áttati-árunum. 1984, 1985 og 1986 árgangirnir tykjast góðir. Mælt varð til eitt TAC fyri 1992 upp á 50.000 tons, ella tað sama sum í 1991.

Fundurin samtyktið veiðutølini fyri 1992 saunbært hjáløgdu talvu. Føroyar fáa sostatt somu kvotu aftur komandi ár á Flemish Cap, sum er 2.900 tons av toski. Harumframt kunnu Føroyar fiska av eini "others-kvotu" á "the tail of Grand Bank", Stóra Banka, NAFO-øki 3 NO. Kvotan er 476 tons.

Fundurin viðgjørdi eftirlitsskipanina á NAFO-økinum. Skipanin er endurskoðað og inniber støri samstarv millum eftirlitsskipini, har tey føroysku vaktarskipini eisini luttaka eitt ella tvey tíðarskeið av árinum, sum er umleið 3 vikur í senn. Kanada hevur eisini sett fram uppskot um, at eftirlitsskipanin eisini skal fevna um eftirlit gjørt av flogførum hjá limalondunum.

Fráboðanarskipanin (HAIL SYSTEM), sum áliggur øllum fiskiskipum at boða frá, tá tey koma, skifta øki ella fara av NAFO-økinum er sett í verk og samtykt á fundinum saman við øðrum broytingum í eftirlitsskipanini. Fráboðanin verður send heimlandinum, sum síðani fráboðar NAFO og hinum limalondunum. Eisini eru samtyktar reglur um merking av fiskireiðskapi. Fundurin samtykti, at sami arbeiðsbólkur, sum higartil hevur endurskoðað eftirlitsreglurnar, skal arbeiða víðari við skipanini og nýggjum skipanum herundir elektroniska eftirlitsskipan (tracking system) og fiskiloyvisskípan í framtíðini.

Semja var um, at fyribils toskabannið á øki 3L verður at halda fram í 1992.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 61/1991: Regulering av fiskiskapinum á NAFO - økinum í 1992.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. desember 1991 og eftir 1. viðgerð 18. desember 1991 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur sambært § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 á fundi tann 19. desember 1991 givið fyribils góðkenning av málinum.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

62. Regulering av veiðuni av laksi í 1992 sambært viðtøkunum í Norðuratlantisku Laksakonventiónini (NASCO)

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NASCO ársfundinum í juni 1991 um reglur fyri fiskiskapinum eftir laksi á ytru føroysku landleiðini.

Viðmerkingar

Nevndin fyri landnyrðingspartin av Atlantshavi hjá Laksakonventiónini í Norðuratlantshavi (NASCO) hevði fund í Edingburgh í Skotlandi 10. - 14.- juni 1991. Á fundinum vórðu samtyktar reglur fyri fiskiskapin eftir laksi undir Føroyum í árinum 1992.

(Frágeiðing um ársfundin er løgd hjá sum skjal 1.)

Nevndin hevur samtykt, at føroyska laksaveiðan skal vera eftir eini skipan, sum ásetur reglur um minstamát, tal av veiðiloyvum, veiðitíð og veiðidagar, avmarkar veiðutrýstið í einum royndartíðarskeiði uppá 1 ár. Skipanin í føroyskari umseting er løgd hjá. (skjal 2).

Skipanin er í høvuðsheitum hin sama sum fyri 1990 og 1991, tó nú bert galdandi fyri eitt ár. Kvotan er óbroytt 550 tons fyri eitt ár.

Talið av veiðiloyvum er sett niður úr 26 í 15 (bert 13 laksabátar hava søkt um loyvi 3 tey seinastu árini) og talið av veiðidøgum er minkað úr 1600 niður í 1200 av somu orsøk og teir 150 dagarnir skulu liggja millum 1. januar og 15. apríl (var 30. apríl) og 1. november og 31. desember.

(Samtykt í NASCO) – Umseting úr enskum.

Nevndin fyri landnyrðingspartin av Atlantshavi.

Nevndin fyri landnyrðingspartin av Atlantshavi hjá Laksakonventiónini í Norðuratlantshavi ásetir, við atliti til grein 8, stk. b og við viðurkenning fyri tørvinum at áseta reguleringar fyri føroyskum fiskiskapi í 1992, hesar reglur:

Føroysk veiða verður eftir einari skipan fyri avmarking í veiðitrýsti, sett út í undirskjali 1, galdandi í eitt ár.

Heildarveiðan fyri hetta tíðarskeið skal ikki fara upp um 550 tons.

Undirskjal 1.

Hesar reglur fyri fiskiskapinum eftir laksi á føroyskum fiskiøki skulu galda fyri árið 1992:

1) Leiðir við laksi undir 60 cm verða stongdar samhært vanligu reglunum fyri at steingja leiðir við fiski undir mát, sum galda í føroyskum sjógvi.

2) Talið av fiskiførum, sum fáa laksaloyvi, skal ikki fara upp um 15.

3) Veiðitíðin er avmarkað til 150 dagar millum 1. januar og 15. apríl og 1. november og 31. desember. Føroyskir myndugleikar skulu áðrenn 15. desember 1991 boða NASCO frá, hvussu veiðitíðin verður løgd í 1992.

4) Undir ásetingini um heildarveiði, skal mest loyvda fiskidagatalið fyri laksafiskiskapin á føroyskum fiskiøki, ikki fara upp um 1200 dagar.

Deildin fyri fiski- og aðrari vinnu

Skjal 2.

Málsviðgerð kjh
20.6.1991

Fundarfrágreiðing:

Viðvíkjandi: 8 Ársfundi í NASCO, North Atlantic Salmon Conservation Organization, Felagsskapurin til varðveitan av laksi í Norðuratlantshavi, 10 - 14. juni 1991 í Edinburgh.

F.Ljnr.: 1581-2/91

Sendinevndin (Danmark, vegna Føroyar og Grønland, DFIG) hevur umboð úr Føroyum og úr Grønlandi. (Luttakaralisti er lagdur hjá).

Londini skiftast at hava sendinevndarleiðaran, í ár átti Føroyar tørn. Hetta merkti, at Føroyar fórdi orðið í høvuðsráðnum (Council) og gjørdu framløgu, "opening statement" (lagt hjá).

Føroyska kvotan verður viðgjørd í Nevndini fyri landnyrðingspartin av Atlantshavi (North East Atlantic Commission) og grønlandska í nevndini fyri Grønland (West Greenland Commission). Harumframt er ein nevnd fyri Norðuramerika.(North American Commission)

Evni í Høvuðsnevndini Council

Opening Statement varð lagt fram her. Skráin er drúgv, men lítil umrøða er um tey einstaku evnini, mest bara framløgur av yvirlitum frá skrivara felagsskapsins. DFIG royndi alla tíðina at reka fram undir, at øll limalondini hava rættindi og skyldur, bæði londini, sum hava áirnar laksurin kemur úr og tey londini (Grønland og Føroyar), sum hava týdningarmikil beiti fyri laksi.

Fíggjarliga er felagsskapurin væl fyri, so limagjaldið verður óbroytt í 1992 og ikki prístalsregulerað, sum vanligt er.

Undir viðgerð av veiðihagtølum gjørdi DFIG vart við, at ólógliga veiðan er 36% av tí lógligu. Samtykt varð, at øll lond skulu royna at fáa alla laksaveiði, eisini tráðuveiði og hjáveiði av laksi, við í sini hagtøl.

Felagsskapurin hevur arbeitt við og arbeiðir framhaldandi við spurninginum um veiði í altjóða sjógvi hjá útflaggaðum skipum, undir t.d. polskum ella Panama flaggi.

Viðvíkjandi spurninginum um at kvotur, sum eru fingnar sambært NASCO-sáttmálan verða seldar til privatar felagsskapir, samtykti ráðið at NASCO ikki beinleiðis skuldi blandast upp í hetta, men bert verða kunnað um tað.

NASCO hevur ein happadrátt fyri merki frá laksi. 3 føroyingar vóru millum vinnararnar og fer Fiskiranns´oknarstovan seinni at lata teimum vinningin.

Umrøddir vóru eisini spurningarnar um hvussu aling og havbeiti ávirkar villini laksastovnarnar og eisini hvussu broytingar í umhvørvi og veðurlagi hava ávirkan. Gerðabókin hjá Ráðnum løgd hjá.

Nevndin fyri landnyrðingspartin av av Atlantshavi

Tilfarið frá ICES um støðuna hjá laksastovninum varð lagt ógvuliga væl fram og greiða niðurstøðan var, at einki kann sigast um at støðan í laksastovnunum er verri enn tá kvota varð sett á seinastu ferð. Víst varð á, at aldur laksur nú helst er stórur partur av veiðuni undir Føroyum og aðrastaðni. Hóast prosenttal ikki kann gevast við vissu, so verður mett, at aldur laksur kann vera millum 13,5 og 42 % av veiðuni undir Føroyum. Hetta merkir í veruleikanum, at um kvotan er 550 tons so eru bert millum 476 og 319 tons villur laksur. Hetta sjónarmiðið var bert nevnt í ár, men er komandi ár eitt sterkt argument fyri at føroyska kvotan heldur skal fara upp enn niður.

Tá kvotur og onnur viðurskifti komu til viðgerðar, førdu Føroyar fram, at einki í lívfrøðiligu viðurskiftinum bendu á at neyðugt var at broyta kvotu og

aðrar reguleringar. Sum vant eru hini øll londini øll fyri at minka um føroysku veiðuna. Formaðurin í nevndini sleit so fundin og kallaði partarnar saman til sendinevndarformansfund. Á hesum fundi kravdi Noreg munandi niðurskurð í kvotuni hjá føroyingum, Finland og Svøríki og fleiri kravdu kvotuna nakað niður. USSR segði einki og bert Ísland segði seg kunna góðtaka óbroytta kvotu.

Føroyar hildu fast við sítt og vísti á søguna, har heimáarlondini øll árini bara høvdu trýst Føroyar niður, fyrst uttan fyri NASCO úr yvir 1000 tons niður í 625 og síðani í NASCO í 1987 niður í 597 tons og í 1989 aftur niður í 550 tons. Hesin seinasti niðurskurður var beinleiðis grundaður á áseting í § 9. c. í NASCO-sattmálantum, sum m.a. sigur, at um eitt limaland hevur gjørt tiltøk at verja stovnin, so skal hetta takast við, tá kvota verður ásett, t.e. krevjast kann av øðrum limalondum at minka veiðina samsvarandi. Noreg setti í 1989 bann fyri at veiða við gørnum á havinum og mesta av føroyska laksinum er norskur laksur. Nú 2 ár seinni vísir tað seg, at norska laksaveiðan, hóast garnaveiðan er endað, bert er minkað við 100 tonsum, tí veiðan við øðrum reiðskapi er vaksin munandi.

Ongar grundir vóru sostatt fyri at minka um føroysku kvotuna í ár. Føroyska sendinevndin helt síðani ein fund við norsku sendinevndina og fekk hana yvirtalaða til at góðtaka kvotuna. Afturfyri vildi Noreg hava fiskiloyvistalið niður á 15 og bert gera eina eitt árs kvotu. Eftir nýggjar sendinevndarformansfundir, har serliga Svøríki og EF leingi togaðu ímóti, gjørdi formaðurin eitt uppskot, sum varð samtykt, eisini Føroyar atkvøddu fyri. Hetta gevur somu kvotu upp á 550 tons í 1992, og lækkar fiskidagatalið úr 1600 í 1200, fiskiloyvistalið úr 26 í 15 og minkar um veiðitíðina frá 30. til 15. apríl. Hóast hesir seinastu niðruskurðir bert eru enn eitt tekin um, at hini londini uttan grundir vilja trýsta okkum niður eftir, so hava tær ongan praktiskan týdning í 1992. Tildið var, at líka gott var at fáa eina eitt árs kvotu, tí lívfrøðiliga grundarlagið kann akkurát tað sama peika upp eftir sum niður eftir næsta ár.

Semjan er løgd hjá.

Annað

Semja var ikki um grønlendsku kvotuna fyri 1991 og framefter hóast drúgvar royndir. Canada og USA vístu seg at vera sera stívrend her.

Heldur ikki í Norðuramerikonsku nevndini gjørdu teir arbeiðið liðugt.

Tilmæli til landstýrisgerðarbók:

Landsstýrið góðkennir NASCO-semjuna og leggur málið fyri løgtingið.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 62/1991: Regulering av veiðuni av laksi í 1992 sambært viðtøkunum í Norðuratlantiksu Laksakonventiónini (NASCO).

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. desember 1991 og eftir 1. viðger 18. desember 1991 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Birgir Danielsen, Sverre Midjord og Heini Johansen) hevur sambært § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 á fundi tann 19. desember 1991 givið fyribils góðkenning av málinum. Meirilutin tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Edmund Joensen, Hergeir Nielsen og Tordur Niclasen) førir fram: Vísandi til álit í tingmáli nr. 40/1991 mælti andstøðan til at áleggja landsstýrinum at taka málið um avtalu um laksafiskiskap, sum part av fiskivinnuavtaluni við Ísland, upp til nýggja viðgerð. (Álit í tingmáli nr. 40/1991: Avtala um laksafiskiskap sum partur av fiskivinnuavtaluni við Ísland (lm 103/90).

Samgongan á løgtingi samtykti kortini, at avtalan um laksaveiði á ytru føroysku landleiðini skuldi vera partur av fiskivinnusamstarvinum millum Ísland og Føroyar.

Avtata er sostatt gjørd við privatan felagsskap í Íslandi um, at laksakvotan í føroyskum sjógvi ikki verður fiskað, men seld hesum felagsskapi. Samstundis liggur á ljóði, at botnfiskakvotan í íslendskum sjógvi minkar munandi komandi sáttmálaskeið.

Minnilutin hevur skilt støðuna í laksamálinum soleiðis, at vit føroyingar als ongar heimildir hava til at lóggeva á hesum øki komandi 2 árini, tí at landsstýrið hevur fingið pening fyri at lata vera.

Tí kann tað tykjast marghátttligt, at løgtingið í hesum máli skal samtykkja samtyktina á NASCO ársfundinum í juni í 1991 um reglur fyri fiskiskapin eftir laksi á ytru føroysku landleiðini, at løgtingið skal samtykkja reglur fyri ein fiskiskap, sum løgtingið ongar heimildir hevur til at reka ella at áseta reglur fyri.

Er tað rímiligt, at løgtingið skal samtykkja, at føroyska laksaveiðan skal verða eftir eini skipan, sum ásetur reglur um minstamát, tal av veiðiloyvum, veiðitíð, veiðidagar og avmarkar veiðitrýstið, tá ið sama løgting hevur selt útlendskum felagsskapi hetta veiðiloyvi 3 ár fram í tíðina?

Er tað rímiligt, at løgtingið skal samtykkja, at talið av veiðiloyvum er sett niður úr 26 í 15, og at talið av veiðidøgum er minkað úr 1600 niður í 1200, tá ið sama løgting hevur samtykt at lata laksabátunum endurgjald fyri at lata vera við at fiska laks.

Atburðurin hjá samgonguni við at lata okkara veiðloyvi av hondini til íslendingar fyri lítið og lætt bendir á, at samgongan lítlan áhuga hevði í at varðveita rættindini til at fiska laks, og tí kann tað hava havt tað vánaligu ávirkan á NASCO, at teir koma til ta niðurstøðu, at eingin orsøk var at halda, at Føroyar hava áhuga at varðveita síni veiðirættindi, og tí hava teir skorið okkum niður bæði í veiðiloyvum, veiðidøgum og veiðu.

Framferðin hjá hesi samgongu í laksaspurninginum er átaluverd, og minnilutin tekur ikki undir við hesum uppskoti.

63. Tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur støðu til, hvørjar tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs í árinum 1991 landsstýrið skal fyrireika til framløgu í tinginum sum serstøk mál.

Viðmerkingar:

Í tingmáli nr. 5/1991 legði landsstýrið fram tær "rekommandatiónir", sum Tingmannaráð Útnorðurs hevði gjørt í tíðarskeiðinum 1985 til og við 1990.
Viðlagt fylgja 8 "rekommandatiónir", ið ráðið hevur samtykt í 1991 og verður mælt til, at Løgtingið tekur støðu til, hvørjar "rekommandatiónir" landsstýrið skal fyrireika til framløgu í tinginum sum serstøk mál.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 63/1991: Tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 12. desember 1991 og eftir 1. viðgerð tann 30. januar 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur fingið upplýst frá íslendsku sendinevndini í Tingmannaráð Útnorðurs hvussu mannagongdin er í íslendska altinginum, tá ið tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs verða framlagdar í altinginum. Mannagongin er henda: "Rekommandationerne fremlægges i Altinget af delega-

tionen som forslag til altingsbeslutning. Når Altinget har behandlet forslagene og godkendt dem i form af altingsbeslutning, oversendes de af Altingets kontor til statsministerens kontor. Når de er blevet fremlagt i regeringen, fordeles de på ministerier efter emneområder. Ministerierne rapporterer dernæst året efter til Altinget om de foranstaltninger, som er vedtaget i anledning af Altingsbeslutningerne."

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at hjáløgdu tilráðingar frá Tingmannaráði Útnorðurs í árunum 1985 til og við 1991 verða fyrireikaðar av landsstýrinum til at seta í verk.

Landsstýrið kunnar løgtingið um gongdina í málinum.

64. Broyting í løgtingslóg um almennar skráir

uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 9, stk. 2 verður 4. punktum orðað soleiðis:

"Líkningarráði Føroya verður heimilað at nýta persónnummarið í sambond við fyrisiting av løgtingslóg um frítíð við løn, løgtingslóg um barnastyrk, løgtingslóg um bundna uppsparing og løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareltirlønargrunn."

2. Í § 9, stk. 2 verður skoytt uppí sum 5. punktum:

"Líkningarráðið Føroya verður vegna avgreiðsluskrivstovuna fyri arbeiðsloysistrygging heimilað at nýta persónnummarið í samband við innkrevjing av gjaldi sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlige myndigheders registre.

§ 1.

I lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre foretages følgende ændringer:

1. I § 9, stk. 2, affattes 4. punktum således:

"Færøernes Ligningsråd bemyndiges til at anvende personnummeret i forbindelse med administrationen af lagtingslov om fritid med løn, lagtingslov om børnetilskud, lagtingslov om bunden opsparing og lagtingslov om arbejdsmarkedspension."

2. I § 9, stk. 2 tilføjes som nyt 5. punktum:

"Færøernes Ligningsråd bemyndiges til på vegne af ekspeditionskontoret for arbejdsløshedsforsikring at anvende personnummeret i forbindelse med indkrævning ifølge lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Eftir § 5, stk. 2 í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um almennar skráir kann persónnummar bert nýtast av øðrum enn fólkayvirlitinum, um hetta er neyðugt til tess at røkja skyldur mótvegis skattavaldinum.

Tvær broytingar eru tó gjørdar í lógini, sum geva heimild til at nýta persónnummar í sambandi við fyrisitingina av lógum, sum einki hava við skattaviðurskifti at gera, ella har veitingarnar eftir lógunum eru skattafríar, smb. løgtingslóg nr. 45 frá 11. maj 1989 og løgtingslóg nr. 72 frá 3. juli 1989, sum geva heimild til at nýta persónnummar í samband við fyrisitingina av frítíðarlógini, lógini um barnastyrk og lógini um bundna uppsparing.

Mett verður neyðugt eisini at kunna nýta persónnummar í sambandi við fyrisitingina av løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn og løgtingslógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum verður løgd fyri tingið fyrst í komandi ári. Ætlanin er at innkrevja gjaldið, sum verður ein ávísur prosentpartur av skattskyldugu inntøkuni, saman við vanliga skattinum.

Landstýrið metir tó, at tað er ein óheppin gongd, at gera tílík undantøk frá høvuðsregluni í § 9. Fyriliggjandi uppskot er tí at skilja sum ein fyribilsloysn.

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at taka lógirnar um almennar og privatar telduskráir við upplýsingum um fólk upp til nýggja viðgerð.

Áðrenn møgulig uppskot til broytingar í lógunum koma til politiska viðgerð, skal málið fáa neyva fakliga viðgerð av umsiting og vinnulívi og hevur landsstýrið samtykt at seta eina arbeiðsnevnd, við tí endamáli at útgreina verandi trupulleikar (lóg og umsiting) og at koma við uppskotum um, hvat rættast er at gera til tess at loysa hesar trupulleikar.

Arbeiðsnevndin skal serliga viðgera:

- spurningar viðvíkjandi eintýddari skráseting av persónum og samankoyring av skráum
- spurningin um datatrygd og starvsskipan fyri skrásetingareftirlitið
- spurningar sum frítøka frá kravinum um forskriftir fyri minni tíðandi skráir og reglularmonisering við grannalondini
- tryggleikan hjá tí einstaka borgaranum í sambandi við skrásetingarspurningar.

Fyri at tryggja eina breiða viðgerð av trupulleikum, tørvi, yaskjum og trygdarspurninginum skal nevndin undir arbeiðinum hava nært samstarv við umboð fyri almennar og privatar stovnar og við felagsskapir.

Tá arbeiðið er liðugt, gevur nevndin landstýrinum eina frágreiðing. Í frágreiðingini skulu úrslit, niðurstøður og uppskot verða útgreinað. Frágreiðingin verður almenn.

Álit

frá

Løgtingsmáli nr. 64/1991: Broyting í løgtingsmáli um almennar skráir.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. december 1991 og undir 1. viðgerð 18. desember 1991 beint í rættarnevndina .

Eftir galdandi skrásetingarlóg varð upprunaliga bert loyvt øðrum enn fólkayvirlitinum at nýta P talið í samband við skattlig viðurskifti.

Seinni er lógin broytt soleiðis, at loyvt er at nýta p-talið í samband við fyrisiting av frítíðarlóginni, lógini um barnastyrk og lógini um bundna samansparing.

Landsstýrið upplýsir í málinum, at neyðugt er at nýta p-talið í umsitingini av løgtingslóg nr. 39. frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. Sum kunnugt verður í næstum lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. Ætlanin er at krevja gjaldið til arbeiðsloysistryggingina ian saman við skattinum. Til hetta endamál er eisini ætlanin at nýta p-talið.

Landsstýrið ger í viðmerkingunum til lógaruppskotið vart við, at henda gongd sum heild er óheppin, og eiga hesar frammanfyri nevndu skipanir bert at verða at meta sum fyribilsloysnir. Landsstýrið ætlar sær sum skjótast, at taka lógirnar um almennar og privatar telduskráir upp til viðgerðar. Hetta verður gjørt við, at sett verður arbeiðsnevnd av serkønum fólki, við umboðum fyri umsiting og vinnulív at gera uppskot til dagføringar av allari lóggávuni um telduskráir.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Birgir Danielsen, Bjarni Djurholm og Lisbeth Petersen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um almennar skráir. Meirilutin ger tó vart við tann trupulleika, sum landsstýrið vísir, at gjørd verða so nógv undantøk frá høvuðsregluni í § 9 í lógini um almennar skráir. Út frá hesum seitir meirilutin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast at seta arbeiðsnevnd at viðgera:

- spurningar viðvíkjandi eintýddari skráseting av persónum og samankoyring av skráum
- spurningin um datatrygd og starvsskipan fyri skrásetingareftirlitið
- spurningar sum frítøka frá kravinum um forskriftir fyri minni týðandi skráir og reglubarmonisering við grannalondini
- tryggleikan hjá tí einstaka borgaranum í sambandi við skrásetingarspurningar.

Víðari verður álagt landsstýrinum við støði í omanfyri nevnda nevndararbeiði, at leggja uppskot til nýggja lóggávu um telduskráir fyri løgtingi í ólavsøkutingsetuni 1992.

Meirilutin ger vart við, at nevndin eigur at tryggja sær so breiða viðgerð av trupulleikum, tørvi, ynskjum og trygdarspurninginum sum yvirhøvur møguligt, og soleiðis sum mælt verður til í viðmerking landsstýrisins til hetta tingmál. Meirilutin átalar, at málið er komið so seint fram, at stundir ikki hava verið at givið tí eina so gjølliga viðgerð, sum eitt so álvarsamt mál hevur uppiborið. Hóast hesa viðmerking kann meirilutin sum nevnt og soleiðis sum umstøðurnar eru, mæla løgtingimum til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

Minnilutin (Signar Hansen) førir fram:

Tá ið málið um broyting í løgtingslóg um evnisskráir varð viðgjørt á tingi í 1989, mælti Javnaðarflokkurin frá, at uppskotna broytingin í løgtingsmáli um evnisskráir hjá almennum myndugleikum varð samtykt, áðrenn skrásetingarspurningurin varð kannaður út í æsir.

Fólkaflokkurin hevur markerað seg sum tann flokk, ið er harðast ímóti nýtsluni av P-talinum og hevur víst á teir, tykist tí løgið, at somu flokkar, ið nú mynda landsstýrið leggja uppskot fram, ið gongur beint ímóti tí, ið teir fórdu fram í 1989.

Minnilutin vísir á, at tað var samgongan, sum sat frá 1981 til 1984, ið kom við lóginí um evnisskráir (P-talið). Tjóðveldisflokkurin kundi tá ikki taka undir við eini slíkari skipan og mótmælti, at henda lóg varð sett í gildi fyri Føroyar.

Lógin kom tí til at vera sera nógv avmarkað og kann í dag bert nýtast í samband við skatt.

Í framlagda uppskoti frá landsstýrinum verður nú mælt til, at Líkningarráð Føroya verður heimilað at nýta persónsnummarið í samband við fyrisiting av løgtingslóg um frítíð við løn, løgtingslóg um barnastyrk, løgtingslóg um bundna uppsparing og løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Hóast landsstýrið hevur havt ríkiligt av tíð at viðgjørt hetta mál, so er tað ikki gjørt, og tí verður framlagda uppskot at skilja sum ein fyribils loysn, og kann minnilutin ikki taka undir við málinum og setir einki uppskot fram.

65. Avtøka av løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Uppskot

til

Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verður sett úr gildi. Reglur v.m. í samband við lóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verða settar úr gildi.

§ 2.

Landsstýrinum verður heimilað at seta kanningar í verk um:

1) at hækka fólkapensiónina,
2) saman við hinum pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at finna fram til lívstryggingar og pensiónskipanir fyri feløg og einstaklingar.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om arbejdsmarkedspensionsfond.

§ 1.

Lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkedspensionsfond ophæves. Regler m.m. i forbindelse med lov om arbejdsmarkedespensionsfond ophæves.

§ 2.

Landsstyret får hjemmel til at sætte undersøgelser i gang om:

1) at forhøje folkepensionen,
2) sammen med de andre parter på arbejdsmarkedet at finde frem til livsforsikringer og pensionsordninger, der gælder såvel kollektivt som enkeltpersoner.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar:

Lógin um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn er lóg um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin frá 9. juni 1988 í lítið broyttum líki. Lógin hevur teir somu vansar, sum víst hevur verið á við tí samhaldsføstu lógini.

Fólk koma at gjalda inn í henda eftirlønargrunn øll árini og fáa einki úr aftur grunninum, um tey flyta burtur. Heldur ikki tey avvarðandi fáa nakað, um ein doyr, ið hevur goldið inn í grunnin allar sínar dagar.

Hinvegin kunnu tilflytarar, sum einki hava goldið inn í grunnin, fáa fulla upphædd úr grunninum.

Tað er í so máta eingin munur á fólkapensiónini og gjaldi úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum uttan tann, at talan verður um tveir grunnar við hvør sínari nevnd ella stýri og skrivstovum. Í øðrum londum verður hetta kallað skrivstovuveldi ella "bureaukrati".

Lógin um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, ið varð samtykt í síðstu tingsetu, er lýst at fáa gildi hin 1. januar 1992, tá ið hvør skattgjaldari skal rinda grunninum 1/2% av inntøku síni og hvør arbeiðsgevari eisini 1/2% av útgoldnu lønunum.

Í staðin mælir Kristiligi fólkaflokkurin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur til í fyrsta lagi at hækka fólkpensiónina og á tann hátt røkka ídnám, ið ætlað er við lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Tá slepst undan at leggja eyka byrðar á partarnar á arbeiðsmarknaðinum, og tá slepst undan at fara upp um 50% skattamarkið og undan at økja um talið á almennum stýrum og skrivstovum.

Tá slepst eisini undan at broyta lógina um evnisskráir og undan at økja um nýtsluna av p-talinum.

Í øðrum lagi vil flokkurin minna á tær lívstryggingar, sum bæði feløg og einstakir persónar í dag kunnu tekna, har tú fært uppspardu pengarnar aftur við rentu, bæði við aldrinum, sjúku og avlamni. Við deyða fáa tey avvarðandi peningin útgoldnan.

Nøkur av fakfeløgunum hava verið framsíggin og longu roynt tílíkar tryggingar við góðum úrsliti. Hetta man vera tann betri vegurin at ganga heldur enn teir nógvu almennu grunnarnir, ið landsstýrissamgongan millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin hevur í hyggju at seta á stovn. Tí verður hetta lógaruppskot sett fram nú fyri árslok 1991.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 65/1991: Avtøka av løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 15. december 1991 og eftir 1. viðgerð 6. februar 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Anfinn Kallsberg, Bjarni Djurholm og Signar Hansen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen) mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

66. Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1992

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond, góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagfest 15. oktober 1991 um sínamillum fiskirættindi í 1991 millum Føroyar og EF.

Viðmerkingar:

1. Tann 14. og 15. oktober 1991 vóru samráðingar millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EF-nevndina í Tórshavn um sínamillum fiskirættindi í 1991 millum Føroyar og EF. Úrslitið av samráðingunum er hjálagda skipan, undirritað í Tórshavn 15. oktober 1991.

2. Sáttmálin fyri 1992 javnvigar á sama støði í toskavirði, sammett við sáttmálan fyri 1991. Sum avtalað undir samráðingunum, millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EF- nevndina í Tórshavn, um sínamillum fiskirættindi í 1991 millum Føroyar og EF, góðtók føroyska samráðingarnevndin at Føroyar onga toskakvotu fáa í fyrrverandi Eysturtýskum sjóøki í 1992, tó at sáttmálin millum ríkisstjórnina í Kongaríkinum Danmark og Føroya Landsstýri øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska Tjóðveldinum hinumegin, um sínamillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið, sum EF er bundið av eftir týsku sameiningina, ikki gongur út fyrr enn 31. mars 1992.

Í 1991 eiga Føroyar 340 tons av toski í fyrrverandi eysturtýskum sjóøki. Hendan kvotan fellur burtur í 1992.

3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1991 av ósløgdum fiski eru hesar:

Hjá EEC-skipum á landleiðini:

Samlaða nøgdin av botnfiski, svartkjafti og makreli verður í 1992 (1991-nøgdin í klombrum, Løgtingsmál nr. 66/1991: Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskirættindi í 1992, har broytingar eru):

500 tons av toski og hýsu
2.500 - - upsa
7.000 - - kongafiski
3.600 - - blálongu og longu (íroknað stinglaks og langasporl)
1.000 - - flatfiski (svartkalvi íroknaður)
760 - - ymiskum fiskasløgum
25.000 - - svartkjafti
4.550 - - makreli

Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymiskum botnfiski sum hjáveiðu í fdnaðarfiskiskapi; í 1991 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu á havleiðunum vestan fyri Skotland.

(b) 5.460 tons av tí vestara makrelstovninum. Roknað verður við, at Føroyar fáa loyvi at veiða 1.000 tons av kvotuni fyri 1990 cystan fyri 4oV, vísandi til stk. 2 í váttaðu frásøgnini frá samráðingunum í Tórshavn.

(c) 7.000 tons av rossamakreli.

(d) 9.000 tons av hvítingsbróðuri, 9.000 tons av nebbasild og 2.000 tons av brislingi. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróður (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan) og nebbasild, treytað av, at øll veiðunøgdin fyri hvítingsbróðuri (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 20.000 tons.

(e) 660 tons av sild vestan fyri Skotland.

(f) 62.000 tons av svartkjafti. Í veiðuni av svartkjafti er loyvt at hava hjáveiðu av gulllaksi, sum ikki slepst undan.

(g) 500 tons av sild í Skagerak.

(h) 125 tons av hcmara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3 PS (St. Pierre og Miquelon).

Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (samb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EF og Grønland).

Í 1991 eru kvoturnar í grønlendskum sjógvi nakað broyttar samnmett við árini undan, av tí at rækjukvota er flutt eysturum.

(i) 105 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (Í 1991 160 tons). 1.045 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1991 990 tons).

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønland).
(l) Loyvt er í 1991 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland.

Hjá føroyskum skipum í fyrrveraudi Eysturtýskum sjógvi

(m) 0 tons av toski í ICES-økið IIId (í 1991 340 tons).

Vísandi til stk. 2 í váttaðu frásøgnini er á sama hátt sum í 1990 grundarlagið undir semjuni um makrel, at ein heildarkvota verður avtalað millum Noreg, EF og Føroyar. Fer heildarkvotan upp, so skulu Føroyar eisini fáa støri part.

Reglurnar fyri fiskiskapi eru óbroyttar í 1992 bæði hjá Føroyum og EF.

Váttaða frásøgnin týdd til føroyskt og allur sáttmálin fyri 1992 á enskum eru løgd hjá.

Váttað frásøgn um samráðingar um fiskiskapin millum EF og Føroyar í Tórshavn 14. - 15. oktober 1991.

1. Ein sendinevnd umboðandi Føroya Landsstýri við harra Kjartan Hoydal sum formanni, og ein sendinevnd umboðandi felagsskapin við harra Henrik Schmiegelow sum formanni, hittust í Tórshavn 14. - 15. oktober 1991 til samráðingar um sínamillum fiskiskap í 1992.

Í samsvari við avtaluna um fiskirættindi millum EF øðrumegin og stjórnina í Danmark og Heimastýrið í Føroyum hinumegin, samdust sendinevndirnar um at viðmæla myndugleikum teirra, at tær kvotur fyri 1992, ið eru upproknaðar í hjálagda skjali, skulu galda fyri skip hjá einum av pørtunum, sum fiska í sjógvi hjá hinum partinum.

2. Partarnir umrøddu røktina av og veiðu av vestara makrelstovninum og vóru samdir um, at tiltøk áttu at verið gjørd sum avtalað, fyri at fremja varðveiting og gagnnýtan av hesum stovni.

Føroyski parturin greiddi frá ætlan síni at avmarka veiðuna í 1992 av vestara makrelstovninum í føroyskum sjógvi og føroysku veiðuna í altjóða sjógvi í norska havinum (ICES øki IIa) til í mesta lagi 20.000 tons, íroknað 4.550 tons til EF í Føroyskum sjógvi.

Hesa nøgd hava føroyingar góðkent útfrá einum EF-TAC fyri ICES økini V b (EF øki) VI, VII, VIII a, b, d, e, XXI, XIV uppá 363.170 tons fyri 1990. Føroyar tilskila sær rætt til broytingar, um TAC víkir frá nevndu upphædd. Í slíkum føri samdust partarnir um at samráðast, so at veiðiavmarkingin, sum Føroyar ganga undir og kvoturnar, sum verða býttar millum partarnar, kunnu broytast sambært frávikini í TAC.

Um EF avger at teirra fiskimenn kunnu fiska partar av teirra kvotu, sum er ásett til EF makrelveiðu í ICES øki II a (uttan EF øki), V b (EF øki), VI, VII,

VIIIa, b, d, e, XII og XIV í EF økinum hjá ICES IV a norðanfyri 59oN, skulu føroyskir fiskimenn sleppa at taka sama part av føroysku kvotuni uppá 5.460 tons á EF-økinum á ICES IVa, norðanfyri 59oN.

Partarnir vóru samdir um, at ásettu veiðunøgdirnar fyri 1992 viðvíkjandi vestara makrelinum var ein ad-hoc avtala fyri 1992 og ikki prejudiserar framtíðar avtalur.

3. Um kvoturnar hjá føroyskum skipum, sum fiska í grønlendskum sjógvi, samhært § 1 (3) í EF-Grønland protokollini (1990-94) varð semja.

4. EF-samráðingarnevndin setti fram eitt ynski frá EF- fiskimonnum um loyvi at reka royndarveiðu eftir Stórari Jákupsskel (Pecten maximus) í føroyskum sjóøki.

Føroyska sendinevndin lovaði at viðgera eina umsókn um tílíka royndarveiðu við vælvild eftir treytum, ið føroysku myndugleikarnir seta í samráð við umsøkjararnar.

5. Sendinevndirnar samdust um, at um annar parturin ætlar at seta í gildi ella broyta fiskireglur, ið koma at galda fyri fiskifør hjá hinum partinum, skal hann boða hinum partinum frá slíkum ætlanum við minst 14 daga ávaring.

Samráðingar skulu verða, um annar parturin ynskir tað.

Serliga varð sipað til bannið fyri allari veiðu á Føroya Banka. Semja var um, at í tráð við ráðgevingina frá ICES, væntandi løgd fram í mai mánaða 1992, at endurskoða steingingina.

6. Partarnir samdust um, at loyvisreglurnar, sum skulu galda fyri 1992, skulu vera samsvarandi frásøgn dagfest 15. oktober 1991 viðvíkjandi loyvum.

7. Samráðingarnevndirnar samdust um, at hvør partur skal senda hinum partinum mánaðarhagtøl, og um annar parturin heldur tað vera neyðugt, vikuhagtøl fyri veiðu hjá skipum hjá hinum partinum á sínum fiskiøki.

Sum úrslit av týsku sameiningini er EF lógligur arvingi viðvíkjandi "Sáttmálanum millum ríkisstjórnina í Kongaríkinum Danmark og Føroya Landsstýri øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska Tjóðveldinum hinumegin um sínamillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið", undirskrivaður 14. mai 1986 og er galdandi fyri fyrsta fimm ára skeiðið til 31. mars 1992.

Samráðingarnevndirnar staðfestu aftur avtaluna frá desember 1991 um at sáttmálin verður settur úr gildi, tá fyrsta fimm ára sáttmálaskeiðið endar 31. mars 1992.

Kvotur í 1992.

1. Hvør parturin skal lata kvotur, sum nevndar eru niðanfyri, til hin partin á sjóøki sínum.

1.1. Kvotur hjá EEC-skipum á føroyskum sjóøki.

Fiskasløg	**Øki**	**Nøgd (tons)**	
Toskur og hýsa	Vb	500	
Upsi	Vb	2.500	
Kongafiskur	Vb	7.000	
Blálonga og longa	Vb	3.600	(1)
Flatfiskur	Vb	1.000	(2)
Svartkjaftur	Vb	25.000	
Makrelur	Vb	4.550	
Onnur fiskasløg	Vb	760	

(1) Íroknað hjáveiða av langasporli og stinglaksi.

(2) Íroknað svartkalva.

1.2. Kvotur hjá føroyskum skipum í EÆC-sjógvi.

Fiskasløg	**Fiskiøki**	**Nøgd (tons)**	
	ICES-øki ella NAFO-øki		
Longa, brosma og blálonga	VIa (1) VIb	800	(2)(3)
Blálonga	VIa (1), VIb	940	(4)
Makrelur	VIa (1),VII, e, f, h	5.460	
Sild	VIa (1)	600	
Rossamakrelur	IV, VIa (1),VIIe, f, h	7.000	
Hvítingsbróður	IV, VIa (1)		
Brislingur	IV, VIa (1)	20.000	(5)
Nebbasild	IV		
Svartkjaftur	VIa (1), VIb, VII (6)	62.000	(7)
Annar botnfiskur (bert hjáveiða)	IV, VIa (1)	400	
Sild	IIaN (Skagerak) (8)	500	
Hemari	Alt EEC-økið (undan økið NAFO 3 PS)	125	(2)

(1) Norðan fyri 56oN
(2) Veiðast við línu.
(3) Av hesum kunnu sum hjáveiða av øðrum sløgum veitast upp til 20% í nøgd av hvørjum skipi sær. Hetta er loyvt í ICES øki VIa og b. Hóast hetta kann prosentparturin verða størri teir fyrstu 24 tímarnar av túrinum á ávísum fiskiøki. Samlaða hjáveiðan av øðrum fiski í VIa og VIb má ikki verða meir enn 75 tons.
(4) Kann bert veiðast við troli.
(5) Í hesi heildarkvotu (sum er hvítingsbróður og nebbasild og hjáveiða av svartkjafti, sum ikki slepst undan) eru í mesta lagi 2.000 tons av brislingi. Av hesum kunnu í mesta lagi 6.000 tons fiskast í ICES-økinum VIa norðanfyri 56o30'N, treytað av at EEC eftir áheitan fær gjølligar upplýsingar um veiðunøgd og samanseting av hjáveiðu.
(6) Vestanfyri 12o00'V.
(7) Veiðan av svartkjafti kann hava í sær hjáveiðu av gullaksi, sum ikki slepst undan.
(8) Avmarkað vestureftir av einari linju frá Hanstholm-vita til Lindenes-vita, suðureftir av einari linju frá Skagen-vita til vita í Tistlarne og haðani til næmastu strond í Svørfki.

1.3 P. M. Kvotur hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi s.n. § 1. stk. 3 fiskiveiðisáttmála millum EF og Grønland

Fiskasløg	**Fiskiøki: ICES-øki ella NAFO-øki**	**Nøgd tons**
Rækjur	NAFO 1 (1)	160
Rækjur	XIV	990
Svartkalvi	NAFO 1	150
	XIV	150
Kongafiskur	XIV	500
Lodna	XIV	10.000

(1) Sunnan fyri 68 0 N

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 66/1991: Skipan millum Føroyar og EF um sínamillum fiskiveiðindi í 1992.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. desember 1991 og eftir 1. viðgerð 18. desember 1991 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini fingið skriv frá landsstýrinum, dagfest tann 19. desember 1991, viðvíkjandi makrelkvotum í fiskiveiðindasáttmálanum millum Føroyar og EF fyri 1992. Í skrivinum verður sagt:

"Hægst loyvda veiða av vesturmakreli í 1992 er hækkað úr 363.170 tonsum uppí 423.170 tons, sambært avtaluna millum Noreg og EF og millum Føroyar og EF fyri 1992.

Smb. stk. 2. í Fiskiveiðindasáttmálanum millum Føroyar og EF skulu makrelkvoturnar hækkast samsvarandi.

Veiðan í føroyskum sjógvi og føroyska veiðan í altjóða sjógvi í norska havinum verður hækkað úr 20.000 tonsum til í mesta lagi 23.304 tons íroknað kvotuna til EF sum verður hækkað úr 4.550 tonsum uppí 5.300 tons.

Føroyska makrelkvotan í EF sjógvi verður hækkað úr 5.460 tonsum uppí 6.360 tons".

Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, hevur upplýst fyri marknaðarnevndini, at landsstýrið rættar tølini í avvarðandi kunngerðum samsvarandi hesum.

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 hevur marknaðarnevndin á fundi tann 19. desember 1991 givið fyribils góðkenning av málinum.

Hin samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

67. Løgtingslóg um fólkanøvn

Kapittul I
Fornavn og millumnavn

Fornavn

§ 1.

Hvørt barn skal fáa navn áðrenn tað er 6 mánaðar gamalt.

Stk. 2. Eingin skal hava fleiri enn tvey fornøvn. Sum fornøvn verða ikki viðurkend nøvn, sum ikki av røttum eru fornøvn og onnur nøvn, ið kunnu haldast at verða fólki til ampa.

Stk. 3. Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur. Gjørdur verður listi yvir góðkend nøvn.

Stk. 4. Um navn á barni hjá fólki úr øðrum landi kann landsstýrið í serføri gera undantak frá stk. 3.

§ 2.

Foreldur ella tey, ið foreldraratttin hava, skulu boða sóknarpresti í tí prestagjaldi, har móðirin býr, frá navninum innan ta freist, ið er ásett í 1. stk. 1.

Stk. 2. Er fráboðaða navnið ikki á navnalistanum, verður málið skotið til navnanevndina, ið sett er sambært 15. smbr. tó 1. stk. 4. Navnanevndin ger av, um navnið kann koma á listan, ið nevndur er í 1. stk. 3.

§ 3.

Navn kann eftir fráboðan til sóknarprestin verða broytt ella umskift við annað navn. Tann, sum hevur fleiri nøvn, kann við at boða sóknarpresti frá fáa eitt ella fleiri teirra strikað. Útlend-

Kapitel I
Fornavn og mellemnavn

Fornavn

§ 1.

Et barn skal få navn før det er fyldt 6 måneder.

Stk. 2. Ingen må have mere end to fornavne. Som fornavn kan ikke anerkendes navne, der ikke er egentlige fornavne, og andre navne, der kan være til ulempe for personen.

Stk. 3. Navnet skal være i overensstemmelse med færøsk sprogbrug. Der affattes en liste over anerkendte navne.

Stk. 4. Vedrører navnet barn af personer fra udlandet, kan landsstyret i særlige tilfælde gøre undtagelse fra stk. 3.

§ 2.

Navnet skal anmeldes af forældrene eller forældremyndighedens indehaver til sognepræsten, hvor moderen bor, inden den i 1. stk. 1 nævnte frist.

Stk. 2. Findes det anmeldte navn ikke på navnelisten, skal sagen forelægges for det efter 15 nedsatte navneudvalg, jfr. dog 1. stk. 4. Navneudvalget træffer afgørelse om navnet kan komme på navnelisten, der er nævnt i 1. stk. 3.

§ 3.

Et navn kan ved anmeldelse til sognepræsten ændres eller ombyttes med et andet navn. Den, som har flere navne, kan ved anmeldelse til sognepræsten få et eller flere af dem slettet. Udlænd-

ingur búsettur í Føroyum í 5 ár ella longur kann somuleiðis fáa navn sítt umskift við føroyskt navn ella taka føroyskt navn aftur at upprunaliga navni sínum. Tann, sum áður hevur fingið navnið broytt ella umskift, kann bara fáa navnið broytt ella umskift aftur við loyvi frá landsstýrinum.

Stk. 2. Barn, sum hevur fingið navn, tá ið tað varð heimaskypt, kann við fráboðan til sóknarprest í tí prestagjaldi, har ið móðirin býr, fáa nýtt navn ella annað navn aftrat.

Stk. 3. Í sambandi við ættleiðing kann fornavn/fornøvn á barninum við loyvi frá landsstýrinum verða broytt.

Stk. 4. Í teimum førum, ið nevnd eru í stk. 1-3, verða 1 og 2, stk. 2 nýttar samsvarandi.

Millumnavn

§ 4.

Eittans eftirnavn kann verða givið sum millumnavn. Millumnavn kann ikki verða bundið at eftirnavni við bindistriku. Millumnavn kann vera millumnavnið hjá faðiri ella móður ella eitt navn, sum barnið kann fáa sum eftir reglunum í 6-8 og 13, nr. 1.

Stk. 2. Millumnavnið verður fráboðað sóknarpresti í tí prestagjaldinum, har sum móðirin býr.

Stk. 3. Eisini kann landsstýrið eftir umsókn loyva millumnavni, sum barnið kann fáa sum eftirnavn ella hevur serligt tilknýti til.

Stk. 4. Millumnavn kann verða strikað eftir fráboðan til sóknarprest í tí prestagjaldi, har barnið varð skrivað í kirkjubók.

inge, der har været bosiddende på Færøerne i mindst 5 år, kan ligeledes efter ansøgning til landsstyret få sit navn ombyttet med et færøsk navn eller antage et færøsk navn foruden sit oprindelige navn.

Stk. 2. Et barn, som har fået navn ved hjemmedåb, kan ved anmeldelse til sognepræsten i det præstegæld, hvor moderen bor, få nyt navn eller et yderligere navn.

Stk. 3. I forbindelse med adoption kan barnets fornavn/fornavne ændres med tilladelse fra landsstyret.

Stk. 4. I de tilfælde, der er nævnt i stk. 1-3, finder 1 og 2, stk. 2 tilsvarende anvendelse.

Mellemnavn

§ 4.

Kun ét efternavn kan tillægges som mellemnavn. Et mellemnavn kan ikke knyttes til et efternavn med bindestreg. Et mellemnavn kan være faderens eller moderens mellemnavn eller et navn, som barnet kan få som efternavn efter bestemmelserne i 6-8 og 13, nr. 1.

Stk. 2. Mellemnavnet skal anmeldes til sognepræsten i det præstegæld, hvor moderen bor.

Stk. 3. Landsstyret kan ligeledes efter ansøgning give tilladelse til et mellemnavn, som barnet kan få som efternavn eller har en særlig tilknytning til.

Stk. 4. Et mellemnavn kan slettes ved anmeldelse til sognepræsten i det præstegæld, hvor vedkommende er indført i ministerialbogen.

§ 5.

Í sambandi við ættleiðing kann millumnavn á barninum við loyvi frá landsstýrinum verða broytt. 4 verður nýtt samsvarandi.

Kapittul II
Eftirnavn

§ 6.

Aftrat fornavni skal hvørt barn fáa eftirnavn.

Stk. 2. Eftirnavn kann vera:

1) ættarnavn faðirs ella móður,

2) ættarnavn, sum annað av foreldrunum seinast hevur borið og sum ikki er fingið við giftu,

Stk. 3. Ístaðin fyri ættarnavn kann eftirnavnið hjá barninum vera fornavn faðirs ella móður í hvørsfalli við -son ella -dóttir aftrat í samsvari við kyn barnsins. Er navn faðirs ella móður tvínevni, verður bert annað navnið nýtt í hesum føri.

§ 7.

Foreldur ella tey, ið foreldrarættin hava, skulu boða sóknarpresti í tí prestagjaldi, har móðurin býr frá eftirnavninum saman við fornavninum.

§ 8.

Eftirnavn kann við fráboðan til sóknarprestin í tí prestagjaldinum, har viðkomandi varð skrivaður í kirkjubókina, verða broytt til eitt av hesum møvunum:

1) Eitt av eftirnøvnunum nevnd í 6, stk.3.

§ 5.

I forbindelse med adoption kan barnets mellemnavn ændres med tilladelse fra landsstyret. 4 finder tilsvarende anvendelse.

Kapitel II
Efternavn

§ 6.

Et barn skal foruden fornavn tillægges et efternavn.

Stk. 2. Et efternavn kan enten være

1) faderens eller moderens slægtsnavn,

2) et slægtsnavn, som en af forældrene senest har båret og som ikke er erhvervet på grundlag af ægteskab,

Stk. 3. I stedet for slægtsnavn kan barnets efternavn være faderens eller moderens fornavn i ejefald med tilføjelse af "-son" eller "-dóttir" i overensstemmelse med barnets køn. Er faderens eller moderens fornavn tvetydigt, bruges kun det ene navn i dette tilfælde.

§ 7.

Forældrene eller de, som har forældremyndigheden, skal anmelde efternavnet sammen med fornavnet til sognepræsten i det præstegæld, hvor moderen bor.

§ 8.

Et efternavn kan ved anmeldelse til sognepræsten i det præstegæld, hvor vedkommende er indført i ministerialbogen, ændres til et af følgende navne:

1) Et af de efternavne, der er nævnt i 6, stk. 3.

2) Eitt av ættarnøvnunum nevnd í 6. stk. 2. nr. 1-2, tó ikki, um navnið er fingið við giftu.

3) Eitt ættarnavn, sum annað av foreldrunum hevur fingið, eftir at barnið er borið í heim. og sum ikki er fingið við aðrari giftu. Er navnið fingið eftir 11. skulu foreldrini ella tann, sum foreldraraettin hevur, loyva broytingini.

4) Ættarnavn, sum ein fyrr hevur borið, tó ikki um navnið er fingið við giftu.

5) Ættarnavn hjá stjúkfaðir ella stjúkmóður, tó ikki, um navnið er fingið við giftu, ella tað ættarnavnið, ið stjúkfaðir ella stjúkmóðir seinast hevur borið og ikki er fingið við giftu. Stjúkfaðir ella stjúkmóðir skal loyva broytingina.

2) Et af slægtsnavnene nævnt i 6, stk. 2. nr. 1-2, dog ikke såfremt navnet er erhvervet på grundlag af ægteskab.

3) Et slægtsnavn, som en af forældrene har erhvervet efter barnets fødsel og som ikke er erhvervet på grundlag af andet ægteskab. Er navnet erhvervet i henhold til 11. skal forældrene eller den, som har forældremyndigheden, give tilladelse til anmeldelsen.

4) Et slægtsnavn, som vedkommende tidligere har båret, dog ikke om navnet er erhvervet på grund af ægteskab.

5) Det slægtsnavn stedfaderen eller stedmoderen bærer, medmindre navnet er er hvervet på grundlag af ægteskab, eller det slægtsnavn, stedfaderen eller stedmoderen senest har båret, som ikke er erhvervet på grund af ægteskab. Stedfaderen eller stedmoderen skal samtykke i anmeldelsen.

§ 9.

Ættleitt barn fær ættarnavnið hjá ættleiðingarforeldrunum eftir 6. stk. 2. nr. 1 - 2 ella eftirnavn eftir 6. stk. 3.

Stk. 2. Tó kann í ættleiðingarloyvinum verða tilskilað, at barnið framvegis skal bera sítt eftirnavn.

§ 9.

Adopteret barn får adoptivforældrenes slægtsnavn efter bestemmelserne i 6. stk. 2. nr. 1-2, eller efternavn efter bestemmelserne i 6. stk. 3.

Stk. 2. Det kan dog i adoptionsbevilingen bestemmes, at barnet fortsat skal beholde sit eget efternavn.

§ 10.

Vilja hjúnafelagar hava sama eftirnavn, kann annar teirra boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur ættarnavnið hjá hinum, tó ikki um navnið er fingið

§ 10.

Ønsker ægtefæller samme efternavn, kan den ene ægtefælle med anmeldelse til vielsesmyndigheden antage den anden ægtefælles slægtsnavn, medmindre

við giftu.

Stk. 2. Tann av hjúnafeløgunum, ið hevur fingið ættarnavn sítt við giftu, kann boða vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur eftirnavnið aftur, sum hann bar áðrenn hjúnabandið ella tað eftirnavnið, sum hann seinast hevur borið og sum ikki er fingið við giftu.

§ 11.

Tann, ið vil broyta eftirnavn sítt, og ættarnavnið, ið broytt verður til, ikki kann fáast við fráboðan eftir 8, nr. 2-5 ella 10, skal søkja til landsstýrið um loyvi til tað.

Stk. 2. Landsstýrið kann játta umsókn eftir stk. 1, um ikki

1) navnið er vart eftir 12,
2) navnið er alkunnugt søguligt eftirnavn,
3) navnið líkist so nógv teimum nøvnum, ið nevnd eru undir nr. 1 og 2, at tey lætt verða blandað,
4) navnið er ikki í samsvari við føroyskar máfreglur,
5) navnið er navn á landi, býi, bygd ella býlingi,
6) navnið er navn á virki, vøru, felagi og tílíkum, sum er skrásett,
7) navnið av røttum er eitt fornavn, ella
8) navnið er óhóskandi ella kann verða argandi.

Stk. 3. Verður søkt um ættarnavn, ið ikki er eitt av teimum í 13, nr. 1-4 nevndu og ivi er um, at navnið er í samsvari

det er erhvervet på grundlag af ægteskab.

Stk. 2. Den, der har antaget et slægtsnavn på grundlag af ægteskab, kan ved anmeldelse til vielsesmyndigheden genantage det efternavn, vedkommende bar ved ægteskabets indgåelse, eller det efternavn, vedkommende senest har båret og som ikke er erhvervet ved ægteskab.

§ 11.

Den, som vil ændre sit efternavn, og slægtsnavnet, som der ændres til, ikke kan erhverves ved anmeldelse efter 8, nr. 2-5 eller 10, skal ansøge landsstyret om tilladelse til dette.

Stk. 2. Landsstyret kan efterkomme ansøgning efter stk. 1, medmindre

1) navnet er forbeholdt efter 12,
2) navnet er et almindeligt kendt historisk efternavn,
3) navnet ligner så meget de navne, der er nævnt under nr. 1 og 2, at forveksling let kan ske,
4) navnet ikke er i overensstemmelse med færøske sprogregler,
5) navnet er navnet på et land, by, bygd eller bydel,
6) navnet er navnet på en virksomhed, vare, selskab og lignende, som er indregistreret,
7) navnet er et egentligt fornavn, eller
8) navnet er upassende eller kan vække anstød.

Stk. 3. Søges der om et slægtsnavn, der ikke er et af de slægtsnavne, som er nævnt i 13, nr. 1-4, og der er tvivl om

við føroyskar málreglur, verður málið lagt fyri navnanevndina til ummælis.

Stk. 4. Er ivi um stavseting ella snið navnsins, ger landsstýrið av eftir tilmæli frá navnanevndini.

§ 12.

Vard nøvn eru:

1) nøvn, ið eru vard eftir 2 í "Lov nr. 89 af 22. april 1904 om navneforandring" við seinni broytingum,

2) ættarnøvn, ið hereftir verða loyvd sambært 11, stk. 1.

Stk. 2. Við skrivligari fráboðan til landsstýrið kunnu eisini ættarnøvn, sum fólk ið býr í Føroyum, ber, verða vard.

Stk. 3. Hóast navn er vart eftir stk. 1, er loyvt uttan umsókn, at nevnast -son ella -dóttir faðirs ella móður sambært 6, stk. 3 og 8, nr. 1. Ikki er hereftir loyvt at taka upp nýggj ættarnøvn, ið eru samansett av fornavni við -son ella -dóttir aftrat.

Stk. 4. Nøvn eftir bústøðum, ið ikki eru einnevndir her á landi, kunnu hereftir ikki fáa verju og verjan, sum slík nøvn hava eftir higartil galdandi lóggávu, verður avtikin.

§ 13.

Hóast 11, stk. 2, nr. 1-8 kann landsstýrið játta umsókn eftir 11, stk. 1 um umsókta ættarnavnið er:

navnet er i overensstemmelse med færøske sprogregler, forelægges sagen navneudvalget til udtalelse.

Stk. 4. Er der tvivl om navnets stavning eller form, træffer landsstyret afgørelse efter indhentet udtalelse fra navneudvalget.

§ 12.

Forbeholdte navne er:

1) navne, der er forbeholdt efter 2 i lov nr. 89 af 22. april 1904 om navneforandring med senere ændringer,
2) slægtsnavne, der i fremtiden tillades i henhold til 11, stk. 1.

Stk. 2. Ved anmeldelse til landsstyret kan endvidere forbeholdes slægtsnavne, der bæres af personer med bopæl på Færøerne.

Stk. 3. Uanset at et navn er forbeholdt efter stk. 1 er tilladt uden ansøgning at kaldes "-son" eller "-dóttir" af fader eller moder jfr. 6, stk. 3 og 8, nr. 1. Det er herefter ikke tilladt at antage nye slægtsnavne, der består af et fornavn med tilføjelse af -son eller -dóttir.

Stk. 4. Navne efter bopælsnavn, der ikke kun findes ét sted her i landet, kan herefter ikke forbeholdes, og forbehold, som sådanne navne har efter hidtil gældende lovgivning, ophæves.

§ 13.

Uanset 11, stk. 2, nr. 1-8 kan landsstyret efter ansøgning meddele navnebevis efter 11, stk. 1 såfremt det ansøgte slægtsnavn er:

1) ættarnavn, sum verður borið ella hevur verið borið av einum av foreldrum umsøkjarans, ommum og abbum, tó ikki, um navnið er lingið við giftu,

2) ættarnavnið hjá fosturfaðir ella fosturmóður, um fosturfaðir ella fosturmóður gevur loyvi,

3) ættarnavn, ið er lagað eftir ættarnavni við útlendskum sniði til føroyskt snið,

4) ættarnavn, sum umsøkjarin hevur serstakt samband við.

Kapittul III
Fráboðanir og umsóknir
Navnanevnd

§ 14.

Fyri tann, sum ikki hevur lógaldur, skulu foreldrini ella tann, sum hevur foreldrarættin boða frá navnabroytingum ella søkja um loyvi til navnabroytingina.

Stk. 2. Er fráboðanin ella umsóknin fyri ein, sum er 12 ár ella eldri, krevst samtykki frá honum. Í serligum føri kann undantak verða givið frá hesum.

Navnanevnd

§ 15.

Sett verður nevnd við 3 limum og 3 varalimum. Landsstýrið setur nevndina eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, Føroysku Málnevndini og Prestafelag Føroya. Nevndin situr í 4 ár í senn.

1) et slægtsnavn, der bæres eller har været båret som slægtsnavn af en af ansøgerens forældre og bedsteforældre eller medmindre navnet er erhvervet på grundlag af ægteskab,

2) plejefaderens eller plejemoderens slægtsnavn, hvis plejefaderen eller plejemoderen giver samtykke,

3) et slægtsnavn, der indebærer en tilpasning af et fremmedartet slægtsnavn, til færøsk sprogbrug,

4) et slægtsnavn, som ansøgeren har en ganske særlig tilknytning til.

Kapitel III
Anmeldelser og ansøgninger
Navneudvalg

§ 14.

For personer, som ikke har opnået myndighedsalderen, skal anmeldelser og ansøgninger om navneforandringer indsendes af forældrene eller den, som har forældremyndigheden.

Stk. 2. Vedrører anmeldelsen eller ansøgningen en person over 12 år, kræves samtykke til anmeldelsen eller ansøgningen fra denne. I særlige tilfælde kan dog fravigelse gøres fra denne bestemmelse.

Navneudvalg

§ 15.

Der nedsættes et udvalg med 3 medlemmer og 3 suppleanter. Landsstyret nedsætter udvalget efter indstilling fra Føroyamálsdeildin på Færøernes Universitet, Det Færøske Sprognævn og Færøernes Præsteforening. Valget gælder for 4 år.

Stk. 2. Navnanevndin ger lista við viðurkendum nøvnum og endurskoðar hann javnan. Nevndin skal geva ráðum fólkanøvn, stavseting teirra, bending o.a. Landsstýrið kann biðja um tilmæli frá nevndini, áðrenn tað gevur loyvi til navnabroytingar.

Stk. 3. Navnanevndin tekur avgerðir í málum, ið løgd verða fyri hana eftir 2, stk. 2.

Stk. 4. Avgerðir hjá navnanevndini eftir stk. 3 kunnu skjótast til landsstýrið.

Stk. 5. Landskassin ber kostnaðin av nevndararbeiðinum og samsýningar til nevndarlimirnar skulu góðkennast av landsstýrinum.

Stk. 2. Udvalget udfærdiger en liste med anerkendte navne og reviderer denne med jævne mellemrum. Udvalget skal rådgive om personnavne, deres stavning, bøjning o.a. Landsstyret kan anmode om udtalelser fra udvalget, før det giver tilladelse til navneforandringer.

Stk. 3. Udvalget træffer beslutninger i sager, der bliver lagt for dette efter 2, stk. 2.

Stk. 4. Afgørelser, der forelægges for udvalget efter stk. 3, kan indankes for landsstyret.

Stk. 5. Landsstyret afholder udvalgets udgifter og skal vederlag til udvalgsmedlemmerne godkendes af landsstyret.

Kapittul IV
Brot á lógina og revsing

§ 16.

Tann, ið av órøttum nýtir eitt navn, verður revsaður við bót. Átala verður bert reist, um ein órættaður krevur tað, ella um almenn áhugamál krevja tað.

Stk. 2. Kann nakar prógva, at annar nýtir navn hansara av órøttum ella navn, ið líkist hansara so nógv, at tey kunnu verða blandað, kann tann, ið órættin ger, verða dømdur til at gevast at nýta navnið.

Stk. 3. Tann, sum brýtur ásetingarnar í 2, stk. 1 og 7, verður revsaður við bót.

Kapitel IV
Overtrædelse af loven og straf

§ 16.

Den, der uberettiget benytter et navn, straffes med bøde. Påtale finder kun sted, når en forurettet begærer det, eller hvis almene hensyn kræver det.

Stk. 2. Den, der kan godtgøre, at en anden uberettiget benytter vedkommendes navn eller et navn, der har et sådan lighed hermed, at forveksling let kan ske, kan ved dom få den anden tilpligtet til at ophøre med brugen af navnet.

Stk. 3. Den, som overtræder bestemmelserne i 2, stk. 1 og 7, straffes med bøde.

Kapittul V
Ymiskar fyriskipanir

§ 17.

Landsstýrið kann seta nærri reglur um, hvussu lógin verður framd og áseta gjald fyri fráboðanir og loyvir.

§ 18.

Landsstýrið kann gera sáttmálar við onnur lond og Danmark og Grønland um viðurskiftini millum føroyskar og fremmandar rættarreglur um fólkanøvn, heruppií navnavernd. Sáttmálin fær gildi her á landi, tá ið hann er lýstur í Kunngerðablaðnum.

Stk. 2. Landsstýrið kann gera reglur um viðurskiftini millum føroyskar rættarreglur um fólkanøvn heruppií um navnavernd, og samsvarandi reglur, ið galda í hinum norðurlondunum og í Danmark og Grønlandi.

§ 19.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1992.

Stk. 2. Samstundis fara úr gildi 5 og 6 í "forordning" frá 30. mai 1828 "om dåben", lóg frá 4. mars 1857 "om forandring i forordning om dåben", lóg nr. 85 frá 22. apríl 1904 "om navneforandring", lóg nr. 76 frá 1. apríl 1904 "om tillæg til lov om navneforandring", lóg nr. 209 frá 15. apríl 1921 "om tillæg til lov om navneforandring", lóg nr. 66 frá 19. februar 1941 "om tillæg til lov om navneforandring", 49 og 74 í lóg nr. 276 frá 30. juni 1922 "om ægteskabs indgåelse og opløsning" og 2 í lóg nr.

Kapitul V
Forskellige bestemmelser

§ 17.

Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om lovens gennemførelse samt fastsætte gebyrer for meddelelser og tilladelser.

§ 18.

Landsstyret kan indgå overenskomst med andre stater og Danmark og Grønland om forholdet mellem færøske og fremmede retsregler om personnavne, herunder om navnebeskyttelse. Overenskomsten finder anvendelse her i landet efter bekendtgørelse i "Kunngerðablaðið".

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om forholdet mellem færøske retsregler om personnavne, herunder om navnebeskyttelse og tilsvarende regler gældende i de andre nordiske lande og i Danmark og Grønland.

§ 19.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1992.

Stk. 2. Samtidig ophæves 5 og 6 i forordning af 30. maj 1828 om dåben, lov af 4. marts 1857 om forandring i forordning om dåben, lov nr. 85 af 22. april 1904 om navneforandring, lov nr. 76 af 1. april 1904 om tillæg til lov om navneforandring, lov nr. 209 af 15. april 1921 om tillæg til lov om navneforandring, lov nr. 66 af 19. februar 1941 om tillæg til lov om navneforandring, 49 og 74 i lov nr. 276 af 30. juni 1922 om ægteskabs indgåelse og opløsning og 2 i lov nr. 131 af 7. maj

131 frá 7. mai 1937 "om børn født udenfor ægteskab", jbr. 2. stk. 3 í lóg nr. 200 frá 18. mai 1960 "om børns retsstilling".

1937 om børn født udenfor ægteskab, jfr. 22. stk. 3 i lov nr. 200 af 18. maj 1960 om børns retsstilling.

Viðmerkingar

Vanligar viðmerkingar.

I. Inngangur.

Eftir at løgtingið tann 4. mai 1990 í løgtingsmáli nr. 98/1989 hevði samtykt at yvirtaka navnalóggávuna sum føroyskt sermál, avgjørdi landsstýrið at seta nevnd at gera uppskot til løgtingslóg um fólkanøvn og harumframt at gera uppskot um nøvn, stavseting av nøvnum og skráseting av nøvnum. Í februar mánaði 1991 lat nevndin landsstýrinum álit í málinum við uppskoti til løgtingslóg um fólkanøvn, viðmerkingum til uppskotið og greinagerð um fólkanøvn. Álitið er viðlagt málinum. Við uppskotinum hjá nevndini sum grundarlag hevur lógardeildin í landsstýrinum síðani arbeitt við at tilevna uppskotið til løgtingslóg um fólkanøvn.

Gjørdar eru nakrar redaktionellar broytingar og innihaldsligar broytingar í samráð við nevndina.

II. Galdandi rættur.

Í Danmark kom nýggj lóg um fólkanøvn í 1961. Við hesi lóg varð galdandi rættur viðvíkjandi navnarættinum lógarfestur, umframt at onkrar nýskapanir vórðu gjørdar. Lógin umfataði ikki Føroyar, men kundi við kongaligari fyriskipan setast í gildi í Føroyum við teimum broytingum, sum mettar vóru neyðugar vegna serligu føroysku viðurskiftini. Lógin kom í staðin fyri lóg nr. 89 frá 22. apríl 1904 "om navneforandring". Ístaðin fyri lógina frá 1961 kom í 1981 nýggj lóg um fólkanøvn. Hvørgin av hesum báðum lógunum varð sett í gildi í Føroyum. Tí er lógargrundarlagið fyri navnarættinum í Føroyum framvegis lóg nr. 89 frá 22. apríl 1904 "om navneforandring". Í serlóggávuni eru eisini einstakar fyriskipanir um navnarættin, t.d. í "forordning" frá 30. mai 1828, um dópin og lóg nr. 276 frá 30. juni 1922 "om ægteskabs indgåelse og opløsning" og onkrar aðrar fyriskipanir, sum verða avtiknar eftir hesum uppskotinum, soleiðis at lógargrundarlagið fyri navnarættinum hereftir verður samlað í einari lóg.

Høvuðslógin viðvíkjandi navnarættinum, lógin frá 1904 um navnabroytingar, viðvíkur í høvuðsheitum, umframt verju av nøvnum, bert navnabroytingar við loyvi frá yvirvaldinum, ella við kongaligum loyvi eftir higartil galdandi reglum, sbrt. 6 í nevndu lóg. Stórur partur av navnarættinum í Føroyum er tí framvegis ikki skipaður við lóg, men er settur í fyrisitingarligari praksis hjá teimum myndugleikum, sum hava umsitið higartil galdandi navnarætt í Føroyum.

Sum galdandi navnarættur í Føroyum fyriliggur, sum frammanfyri nevnt, kann hann í høvuðsheitum lýsast soleiðis:

Øll børn skulu fáa fornavn og eftirnavn. Navnið skal fráboðast til kirkjubókina í seinasta lagi 1 ár aftaná at barnið er borið í heim. Foreldur ella tann, ið hevur foreldrarættin, hava rætt og skyldu at boða frá navnunum. Nøvn, ið kunnu verða børnum til ampa, skulu ikki verða givin, sbrt. 5-6 og 18 í Fr. frá 1828 um dópin. Søknarpresturin tekur sjálvstøðugt støðu til, um sakligu krøvini til navnið eru lokin. Avgerðin hjá søknarpresti kann eftir tí fyrisitingarligu skipanini skjótast til kirkjumálaráðið. Í umfarsskrivum frá kirkjumálaráðnum eru listar við góðkendum fornøvnum, seinast C, frá 1. desember 1981. Orðalistin hjá M.A. Jacobsen og Chr. Matras frá 1930 hevur eisini verið nýttur sum vegleiðing við navnagávuna. Fornavn kann við kongaligum loyvi frá ríkisumboðnum verða broytt, sbrt. 6 í lógini frá 1904 um navnabroytingar.

Við navnagávuna fær barnið eftirnavnið hjá faðirinum, men kann við loyvi frá ríkisumboðsmanninum fáa gentunavnið hjá móður sbrt. C. frá 28. februar 1956 frá løgmálaráðnum, ella eftirnavnið hjá fosturforeldrunum. Børn fødd uttanfyri hjúnalag fáa við navnagávuna eftirnavnið hjá móður, men kunnu fáa eftirnavnið hjá faðirinum, um faðirskapurin er staðfestur, sbrt. 2 í lóg nr. 131 frá 7. mai 1937 um børn uttanfyri hjúnalag. Eisini kann eftirnavn verða broytt við loyvi frá landfútanum, sbrt. 1 í 1904-lógini, ella við loyvi frá ríkisumboðsmanninum, sbrt. 6 í nevndu lóg. Er navnið vart ella líkist navnið nógv einum vardum navni, kann loyvi bert gevast eftir 6 og bert við loyvi frá teimum, ið bera navnið.

Í heilt serligum førum kann við kongaligum loyvi, loyvi gevast til eitt vart eftirnavn, um so er, at familjan hevur vunnið hevd uppá navnið. Eftirnøvn við -dóttir skoytt uppí kunnu eftir galdandi rætti ikki verða givin. Men eftirnøvn við -son skoytt uppí kunnu verða givin, um tey ikki eru vard.

III. Innihaldið í lógaruppskotinum.

Lógaruppskotið hevur í sær reglur um rætt og skyldu at geva barni fornavn og eftirnavn og tær avmarkingarnar, sum eru í hesum rættinum, og um skyldu at boða frá fornavninum og eftirnavninum, reglur um eftirnavnið hjá hjúnafeløgum og um navnabroytingar og verju av nøvnum.

Í mun til galdandi reglur eru høvuðsbroytingarnar eftir lógaruppskotinum hesar:

1) At navnið skal vera í samljóð við føroyskar málreglur og at gjørdur verður leiðbeinandi listi við viðurkendum nøvnum.

   Undantak skal í serligum førum kunna veitast fólki úr øðrum londum, ið ikki ætla at verða verandi í Føroyum.

2) At eftirnavnið annaðhvørt kann vera eftirnavnið hjá foreldrunum ella for-

navn móður ella faðirs í hvørsfalli við -dóttir ella -son viðheftum í samsvari við kyn barnsins.

3) At einkarrætturin fellur burtur til eftirnøvn, ið eru samansett av fornavni + -son ella -dóttir og at tað heldur ikki skal lata seg gera at hava einkarrætt til at nýta heimstaðarnøvn ella húsanøvn sum eftirnavn, um so er, at onnur halda seg hava líka góðan rætt til at nýta avvarðandi navn.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1 og 2:

Foreldur ella tey, ið hava foreldrarættin, hava skyldu og rætt at geva barninum navn. Tey hava rætt at velja tað navnið, sum barnið skal bera við teimum avmarkingum, ið settar eru í § 1. Tey hava skyldu at boða frá navninum til kirkjubókina (sóknarprestin). Freistin at boða frá navninum er stytt frá einum ári eftir galdandi reglum smb. 5 og 6 í Fr. frá 1828 um dópin til 6 mánaðir eftir § 2 í lógaruppskotinum. Tað er nýggj regla, at eingin skal hava fleiri enn tvey fornøvn, smbr. tó 4 í uppskotinum, og at navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur. Nýggjur er eisini listin við viðurkendum nøvnum fyri so vítt sum, at tey nøvn, ið eru á listanum og tey nøvn sum kunnu koma á listan skulu vera í samljóði við føroyskar málreglur. Listin er eisini bindandi fyri sóknarprestin soleiðis, at um eitt fráboðað navn ikki er á listanum, skal sóknarpresturin leggja málið fyri navnanevndina, ið sett verður sambært § 5 í lógaruppskotinum. Navnanevndin tekur støðu til, um sakligu krøvini til navnið eru lokin, herundir um navnið kann verða til ampa fyri barnið. Nøvn, ið soleiðis verða viðurkend og eisini onnur nøvn, ið navnanevndin metir eiga at verða viðurkend, verða førd á navnalistan. Reglan um at navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur umfatar eisini navn á barni hjá fólki úr øðrum londum, herundir úr hinum pørtunum av ríkinum. Men navn á barni hjá hesum fólkum kemur undir undantaksregluna í § 1, stk. 4, um tey kunnu vísa á viðurskifti, sum gera, at tað er av stórum týdningi fyri barnið, at barnið fær navn í samsvari við navnasiðin í upprunalandi teirra.

Til § 3:

Eins og eftir galdandi reglum verður skotið upp, at tað skal bera til at broyta fornavn (skrivháttin), at fáa sær annað fornavn ella at fáa sær nýtt aftrat, ella, um ein hevur fleiri fornøvn, at strika eitt ella fleiri teirra. Men reglurnar um, hvussu fram skal farast í slíkum førum, eru gjørdar einfaldari, so at tann, sum vil broyta fornavn, fáa sær nýtt ella strika eitt ella fleiri fornøvn, kann gera hetta við fráboðan til sóknarprest, í staðin fyri sum nú við kgl. loyvi. Tó er skotið upp at gera ta avmarking í rættinum, at broyta ella umskifta navn við fráboðan, at hetta kann bert gerast eina ferð, annars krevst loyvi frá landsstýrinum. Henda reglan er sett

fyri at forða fyri óneyðuga nógvum og ógrundaðum ynskjum um navnabroytingar.

Barn, sum er heimadoypt og sum síðani við fráboðan hevur fingið nýtt navn, ella annað navn aftrat, eftir stk. 2 í hesi grein, kann, hóast regluna í stk. 1, seinasta pkt. aftur fáa navn sítt umskift ella broytt við fráboðan.

Ríkisumboðsmaðurin, sum umsitur ættleiðingarloyvini, kann eftir galdandi reglum geva loyvi til navnabroytingar í sambandi við ættleiðingarloyvi. Men nú navnalóggávan er yvirtikin krevst eftir uppskotinum, at landsstýrið gevur loyvi til navnabroytingar, ið verða gjørdar í sambandi við ættleiðing, smbr. eisini 3, stk. 3 og 5.

Sakligu krøvini til navnið, ið broytt verður til, eftir hesi grein, eru tey somu sum við navnagávuna eftir 1.

Til § 4:

Eftir galdandi reglum kann barninum verða givið ættarnavn sum millumnavn, hóast barnið einki familjutilknýti hevur til navnið og hóast navnið er vart. Tílík millumnøvn hava ofta verið nýtt, sum vóru tey eftirnavnið hjá tí, ið bar navnið sum millumnavn. Við fyriliti til tey vardu eftirnøvnini, er í skotið upp, at tílík ættarnøvn bert kunnu verða givin sum millumnavn í teimum førum, ið nevnd eru í 4.

Til § 6:

Henda greinin í uppskotinum viðvíkur reglunum um, hvørji eftirnøvn kunnu gevast barninum við navnagávuna. Eftir hesum reglunum fáa foreldur fleiri møguleikar at velja eftirnavn á barni enn eftir galdandi reglum. Eftir uppskotinum skulu børn ikki longur fáa ættarnavnið hjá faðirinum, men foreldrini ella tann, ið hevur foreldrarættin kunnu velja, um barnið skal fáa ættarnavnið hjá faðir ella móður, ella navn faðirs ella móður í hvørsfalli við -son ella -dóttir aftrat.

Haraftrat verða reglurnar um eftirnavnið hjá barninum nú eftir uppskotinum tær somu fyri børn fødd í hjúnabandi, sum fyri børn fødd uttanfyri hjúnaband, treytað av at faðirskapurin til barnið uttanfyri hjúnaband er staðfestur.

Ættarnavnið, sum foreldrini kunnu velja at geva barninum eftir stk. 2, nr. 1, er tað ættarnavnið, sum foreldrini bóru, ella annað av foreldrunum bar, tá ið barnið varð født. Hetta ættarnavnið kunnu foreldrini geva barninum, hóast annað ella bæði ættarnøvnini hjá foreldrunum eru fingin við giftu.

Foreldrini kunnu í staðin fyri at geva barninum tað ættarnavnið, sum tey bóru, tá ið barnið varð født, eftir stk. 2, nr. 2 geva barninum tað ættarnavnið, tey seinast hava borið treytað av, at hetta ættarnavnið ikki er fingið við giftu. Tílík nøvn hava verið nevnd gentunøvn hjá móðurini, tí eftir galdandi reglum hevur ikki verið møguligt hjá monnum at fáa ættarnavnið hjá hjúnafelagnum við fráboðan til sóknarprest.

Tíftir galdandi reglum kann faðirs ella móður navn við -son ella - dóttir aftrat ikki verða givið sum eftirnavn við fráboðan til sóknarprestin; men nøvn við -son aftrat kunnu tó, um hesi ikki eru vard ella líkjast ov nógv einum vardum navni, verða givin við kgl. loyvi, t. e. frá ríkisumboðsmanninum, aftaná at málið hevur verið lagt fyri løgmálaraðið í ivamálum. Sum praksis hjá løgmálaraðnum er, kunnu nøvn við -dóttir aftrat heldur ikki verða givin sum eftirnøvn við kgl. loyvi, men tílík nøvn kunnu verða givin sum millumnøvn.

Í stk. 3 er skotið upp, at hereftir kann barninum verða givið eftirnavn, sum er navn faðirs ella móður við -son ella -dóttir aftrat. Hesi nøvnini eru ikki at rokna sum ættarnøvn eftir lógaruppskotinum, og tey, sum hava fingið tílík eftirnøvn eftir reglunum í hesum lógaruppskoti, kunnu ikki geva teirra børnum ella hjúnafelaga hetla eftirnavnið eftir stk. 2 í hesi grein ella eftir 10 í uppskotinum.

Til § 8:

Reglurnar í hesi grein í uppskotinum um, at eftirnavnið í ávísum førum kann verða broytt við fráboðan til kirkjubókina, eru nýggjar í mun til galdandi reglur. Sum reglurnar nú eru, kann eftirnavn bert verða broytt við loyvi frá ríkisumboðsmanninum eftir 1904-lógini. Eftir reglunum í nr. 1 og 5 í hesi greinini í uppskotinum kann eftirnavn verða broytt til eitt nýtt eftirnavn, ella til eitt annað eftirnavn við fráboðan, hóast onnur longu hava tað sum ættarnavn og tað er vart og hóast tann, ið vil broyta til navnið, einki familjutilknýti hevur til tey, ið longu bera navnið, ella hava brúkt tað, treytað av, at eftirnavnið, ið broytt verður til, er navn faðirs ella móður við -son ella -dóttir aftrat.

Eftir nr. 2-5 kann broytast til eitt annað eftirnavn við fráboðan treytað av, at onnur hava borið ella bera navnið og at tann, ið vil broyta til hetta eftirnavnið, er soleiðis knýttur at teimum, ið bera ella hava borið navnið, sum nevnt í nr. 2-5.

Til § 9:

Reglurnar í uppskotinum um at ættleitt barn fær ættarnavnið hjá foreldrunum, men at barnið kann varðveita sítt egna eftirnavn, samsvara við galdandi rætt; men eftir uppskotinum kann barnið eisini fáa sum eftirnavn fornavn stjúkfaðirs ella stjúkmóður við -son ella -dóttir aftrat.

Til §10:

Hjúnaband hevur eftir uppskotinum ikki longur í sjálvum sær við sær, at eftirnavnið hjá øðrum av pørtunum verður broytt. Vilja hjúnafelagarnir hava sama eftirnavn krevst hereftir, at annar teirra frammanundan ella undir hjúnabandinum boðar vígslumyndugleikanum frá, at hann tekur ættarnavnið hjá hinum. Hjúnafelagi kann bert taka ættarnavnið hjá hinum, ikki tað eftirnavnið hin hjúnafelagið hevur fingið eftir 6. stk. 3 í lógaruppskotinum ella eftir 8. nr. 1. Reglurnar geva

hjúnafelaganum bert rætt til at taka ættarnavnið hjá hinum sum eitt eftirnavn, ið er fingið við giftu. Tað hevur við sær, at hjúnafelagin í nýggjum hjúnabandi ikki kann geva navnið víðari til ein annan hjúnafelaga; men navnið kann gevast víðari eftir 6, stk. 2, nr. 1 til børn í nýggjum hjúnabandi.

Til 11:

Tann, ið vil fáa sær eitt annað ættarnavn ella nýtt ættarnavn, og tann, ið eftir reglunum í hesum lógaruppskoti nevnist -son ella -dóttir faðirs ella móður, og sum vil taka ættarnavn aftur, ella fáa sær nýtt ættarnavn, skal, um navnið ikki kann fáast við fráboðan eftir 8, nr. 2-5 ella 10, søkja til landsstýrið um tað.

Verður søkt um eitt ættarnavn, ið ikki er eitt av teimum í 13, nr. 1-4 nevndu, kann landsstýrið, um navnið kemur undir reglurnar í 11, stk. 2, nr. 1-8, ikki loyva navninum.

Til 12:

Av tí at -sonar og -dóttir nøvn, ið eru givin eftir reglunum í hesum lógaruppskoti, kunnu koma í stríð við ættarnøvn, ið enda við -son og sum eru vard, er skotið upp, at tað skal verða loyvt at nevnast -son ella -dóttir faðirs ella móður, hóast navnið er vart.

Til 13:

Greinin staðfestir í hvørjum førum loyvi kann gevast til eitt ættarnavn, hóast navnið er vart ella aðrar forðingar nevndar í 11, stk. 2, nr. 1-3, eru fyri at loyva navninum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 67/1991: Løgtingslóg um fólkanøvn.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. december 1991 og var eftir 1. viðgerð 28. januar 1992 beint til viðgerðar í ræittarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fundir við ta nevnd, ið landsstýrið, eftir at navnalóggávan í 1989 varð tikin yvir sum føroyskt sermál, setti til at evna, til uppskot, til løgtingslóg um fólkanøvn. Henda nevnd hevur eisini gjørt uppskot um nøvn, stavseting av nøvnum og skráseting av nøvnum. Uppskotið frá hesari nevndini er viðlagt tingmálinum. Uppskotið frá hesari av landsstýrinum settu nevndini, hevur verið viðgjørt á lógardeildini í Tinganesi, og hevur lógardeildin, út frá hesum uppskoti, tilevnað uppskot til løgtingslóg um fólkanøvn. Tað er hetta uppskot, ið ræittarnevndin hevur fingið til viðgerðar. Viðmerkjast skal, at tað tó í høvuðsheitunum bert eru gjørdar redaktionellar broyting-

ar og naktar fáar innihaldsbroytingar í upprunauppskotinum, og eru hesar broytingar gjørdar í samráð við nevndina, ið gjørdi upprunauppskotið.

Galdandi rættur á hesum øki er í dag lóg frá 1904. Tó er við serlóggávu eisini gjørdar nakrar fyriskipanir um navnarættin, men verða allar hesar reglur nú avtiknar, soleiðis at lógargrundarlagið í framtíðini fyri navnarættinum verður samlað í einari lóg. Nevndin skal gera vart við, at málið er lýst sera væl í drúgvum viðmerkingum frá landsstýrinum, og skal nevndin tí her bert endurgeva høvuðsinnihaldið í lógaruppskotinum.

Uppskotið fevnir um reglur, um rætt og skyldu at geva barninum fornavn og eftirnavn, og um tær avmarkingar sum eru í hesum rættinum. Eisini fevnir uppskotið um skyldu at boða frá fornavninum og eftirnavninum, reglur um eftirnavnið hjá hjúnafeløgum og um navnabroytingar og verju av nøvnum. Í mun til galdandi reglur eru høvuðsbroytingarnar hesar:

1. Navnið skal vera í samljóð við føroyskar málreglur, og gjødur verður leiðbeinandi listi við viðurkendum nøvnum. Undantak skal í serligum førum kunna verða veitt fólki úr øðrum londum, um hesi ikki ætla at verða verðandi í Føroyum.

2. Eftirnavn kann annaðhvørt vera eftirnavn hjá foreldrunum ella fornavn móður ella faðirs í hvørsfalli við -dóttir ella -son viðheftum í samsvari við kyn barnsins.

3. Einarrætturin fellur burtur til eftirnavn, ið er samansett av fornavni og -son ella -dóttir, og skal tað heldur ikki í framtíðini lata seg gera at hava einkarrætt til at nýta heimstaðarnavn ella húsanavn sum eftirnavn, um so er, at onnur halda seg hava líka góðan rætt til at nýta avvarðandi navn.

Nevndin kann taka undir við landsstýrinum í tí sjónarmiði, at stórur tørvur er á nýggjum og tíðarhóskandi rættarreglum viðvíkjandi fólkanøvnum. Nevndin ger vart við, at navnalistin, ið nógv orðaskifti hevur verið um, skal vera leiðbeinandi. Nevndin heldur eisini tað vera beinast, at navnanevndin fær eina breiðari umboðan. Nevndin skjýtur tí upp at broyta § 15, soleiðis, at landsstýrið velur nevndina eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, Prestafelag Føroya og eigur tað triðja umboðið at verða valt eftir tilmæli frá mentunardeildini á landsskrivstovuni.

Út frá hesum setir ein samd rættarnevnd fylgjandi:

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 15 verður orðað soleiðis:

"Sett verður nevnd við 3 limum og 3 varalimum. Landsstýrið setir nevndina eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, prestafelag Føroya og Mentunardeildini á landsskrivstovuni. Nevndin situr 5 ár í senn."

§ 15 affattes således:

"Der nedsættes et udvalg med 3 medlemmer og 3 suppleanter. Landsstyret nedsætter udvalget efter indstilling fra Føoyamálsdeildin på Færøernes Universitet, Det Færøske Sprognævn og Færøernes Præsteforening og kulturafdelingen på landsstyreskontoret. Valget gælder for 5 år."

Ein samd rættarnevnd mælir sostatt løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um fólkanøvn við omanfyristandandi broyting.

68. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1992

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond, góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 13. desember 1991 millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1992.

Viðmerkingar

Váttaða frásøgnin frá fundinum millum føroyskar og norskar myndugleikar í Bergen 12.- 13. desember 1991 um sínámillum fiskivinnurættindi í 1992 er løgd hjá.

Stovnsmetingar í Barentshavinum

Tøl eru komin frá fiskifrøðingunum, (ACFM), um veiðu av toski, hýsu og lodnu í Barentshavinum. Tilráðingin fyri tosk var fyri 1991 215.000 tons, (ein vøkstur upp á 45.000 tons), fyri hýsu óbroytt og fyri lodnu 1 mió. tons. (0 tons í 1990). Fyri 1992 eru ongar beinleiðis tilráðingar. Sovjet og Noreg samráddust í Murmansk í viku 47. Teir samdust um eitt TAC upp á 300.000 tons. Noreg og Sovjetsamveldið samdust um at lata triðjalondum 30.000 tons av toski. Hetta umfatar eisini veiðuna í Svalbard Verndar- økinum.

Sunnan fyri 62°, Noreg

Sunnan fyri 62° verður makrelkvotan økt í 1992. Hetta eru Noreg og Felagsmarknaðurin vorðin samd um. Stovnsmetingarnar um síld og upsa í 1992 sunnan fyri 62° eru líkar teimum fyri 1991.

Samráðingar við Noreg 13 - 14. desember 1990

Tá norski fiskimálaráðharrin vitjaði í august 1991 fekk landsstýrið at vita, at Noreg kundi lata Føroyum lodnu í 1992. Noreg og Sovjet samdust 22 november um, at veiðast kundu 834.000 tons av vetrarlodnu í 1991 í Barentshavinum. Eingin avtala er gjørd um summarlodnu. Londini avtalaðu sínamillum, at tey kundu lata triðjalondum 20.000 kr. hvørt.

Væntað varð annars, at Føroyar fóru at fáa sín part av teirri øking, sum hevur verið í TAC fyri tosk í 1991 og hetta kom eisini at halda.

Svalbard er ikki beinleiðis við í sáttmálanum, har fáa Føroyar eitt ávíst prosent. Fyri 1991 var toskakvotan við Svalbard 295 tons, í 1995 er hon 410 tons. Rækjudagatalið er óbroytt.

Samráðingarúrslit:

Føroyska kvotan í Barentshavinum øktist samsvarandi við TAC, men nakað minni varð flutt frá sovjetskum sjógvi í norskan sjógv.

Noreg fekk fyri hetta eina øking í botnfiskaveiðini undir Føroyum, 6300 móti 5800 tonsum. Tann upsakvota, sum í fjør varð sett til 2800 tons, varð økt upp í 3800 tons. Noreg fekk eina 5000 tons tossamakrelkvotu og fyri fyrstu ferð skiftu Føroyar og Noreg um kvotu av hennara og hávi. Bæði londini fingu prosentvísa øking í makrelkvotuni í samsvari við, at makrelkvotan yvirhøvur er vaksin.

Talið av fiskiloyvum er óbroytt.

Sínamillum kvotur 1992 og árini undan:

	Føroyar í norskum sjógvi					*Noreg í føroyskum sjógvi*				
	1988	**1989**	**1990**	**1991**	**1992**	**1988**	**1989**	**1990**	**1991**	**1992**
Botnfiskur:										
Toskur	3400	1700	850	1035	1445					
Hýsa	950	400	100	100	200					
Annað	850	300	200	250	300					
Upsi	1500	1600	4000	2800	3800	6000	6000	5600	5800	6300
Yvirflutt úr sovjetskum sjógvi										
Toskur	8300	3000	1500	1900	900					
Hýsa			200	250	100					
Annað			200	250	50					
Ídnaðarfiskur og nótafiskur:										
Sv.kj.	10000	10000	10000	10000	10000	60000	35000	35000	30000	30000
Makr.	3000	3000	3000	6000	7000	12000	10630	10630	14500	17000
Rossam.						0	0	0	0	5000
Hv.br.	22000	22000	22000	22000	20000					
Sild	1600	1300	1300	1100	1100					
Hemari	0	0	0	0	300					
Hávur						0	0	0	0	300
Brugda						100	100	100	100	100

Javnvágin í toskajavnvirði fyri 1992 er økt við 1700, so sáttmálastøðið er nakað hækkað.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 68/1991: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1992.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1991 og eftir 1. viðgerð 18. desember 1991 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur sambært § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 á fundi tann 19. desember 1992 givið fyribils góðkenning av málinum.

Ein sand nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

69. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1992

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 10. desember 1991 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1992.

Viðmerkingar

Váttaða frásøgnin frá 15. fundinum í føroysku-sovjetisku felagsnevndini um sínamillum fiskivinnumál er hjáløgd. Samráðingarnar fóru fram í Tórshavn 9.-10. desember 1991.

Sovjetisku umboðini søgdu, eins og tað varð ført fram undir samráðingunum í Murmansk í desember 1990, at tað ikki var møguligt at lata nakra kvotu í Eysturssjónum í 1992. Orsøkirnar til hetta eru, at Baltisku londini eru vorðin sjálvstøðug, at einki TAC er ásett fyri Eysturssjógvin og at Sovjet ikki hevur gjørt avtalu um fiskiveiði við Baltisku londini.

Í Barentshavinum var økingin í toski, hýsu og hjáveiðu umleið tann sama sum TAC fyri tosk øktist. Føroyar fingu somu lodnukvotu sum í fjør, og eina øking í rækjukvotuni. Sovjet hevur enn sama áhuga í svartkjaftakvotuni undir Føroyum.

Í sáttmálanum fyri 1992 eru partarnir vorðnir samdir um at arbeiða fyri víðkaðum samstarvi millum feløg og virki innan fiskivinnuna. Ein serlig nevnd skal setast í seinasta lagi í januar 1992 at fáa gongd á hetta. Víst verður til grein VIII í váttaðu frásøgnini.

Fyritreytirnar fyri samráðingunum

Í norsk-sovjetsku sínamillum fiskivinnunevndini áseta londini, hvussu nógvur toskur og hýsa skal veiðast í Barentshavinum. Harumframt áseta tey eisini, hvussu nógv kann latast triðjalondum.

Í sáttmálanum fyri 1992 øktu Noreg og Sovjet triðjalandskvotuna samsvarandi við økingini í "TAC"um fyri 1992. Í hesum sáttmálanum varð eisini ásett, hvussu nógv ávikavist Sovjet og Noreg kundu lata triðjalondum av toski og hýsu í búskaparliga øki teirra í Barentshavinum.

Gongdin í TAC-num fyri tosk í Barentshavinum hevur verið hendar:

	TAC frá fiskifrøðingum		**Heildarkvota ásett**	
1986	< 446.000		400.000	
1987	< 645.000		560.000	
1988	(530.000)	363.000	(578.000)	451.000
1989		300.000		360.000
1990		172.000		163.000
1991		215.000		215.000
1992				300.000
300.000				

Heildarkvotan fyri hýsu í 1992 er ásett til 55.000 tons. Hon var í 1991 25.000 tons.

Úrslit av samráðingunum

Kvotan, ið varð ásett fyri tosk og hýsu í Barentshavinum, var tað mesta Sovjet, sambært sáttmálanum við Noreg, kundi lata triðjalondum, og umframt hetta varð ein kvota uppá 10% av hesari ásett fyri hjáveiði av øðrum fiskasløgum.

Flatfiskur og skeljar vóru óbroytt, og rækjukvotan øktist 500 tons. Lodnukvotan varð tann sama sum í fjør, og hon kann veiðast í tíðini frá 1. januar til 30. apríl 1992.

Sovjet fekk umleið ta somu heildarnøgdina undir Føroyum sum í 1991.

Úrslit fyri 1992 (nøgd í tonsum).

Føroysk rættindi	**1990**	**1991**	**1992**
Barentshavið			
Toskur, hýsa (& hjáveiða 90+91)	5.400	7.800	8.360
hjáveiða (1992)			836
Flatfiskur	3.500	3.500	3.500
Eystursjógvurin, toskur	5.500	2.750	–
Heild, botnfiskur	14.400	14.050	12.696
Rækjur	2.500	2.500	3.000
Skeljar	1.000	1.000	1.000
Lodna	–	20.000	20.000

Sovjetsk rættindi	**1990**	**1991**	**1992**
Svartkjaftur	100.000	122.500	120.000
Makrelur	4.200	--	-
Høgguslokkur	2.000	2.000	2.000
Djúpt vatn	200	200	200

Talið av fiskiloyvum hjá báðum pørtum er tað sama sum í ljør.

Váttað frásøgn

frá fimtanda fundinum í føroysku-sovjetsku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál.

I Eftir innbjóðing frá Føroya landsstýri og sambært sáttmálanum frá 27. november 1977 millum stjórn Sovjetsamveldisins øðrumegin og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri hinumegin, um sínámillum fiskirættindi Føroyar-Sovjetsamveldið varð fimtandi fundur í føroysk-sovjetsku felagsnevndini hildin í Tórshavn í døgunum 9.-10. desember 1991.

II Sum umboð fyri sáttmálapartarnar á 15. fundi í felagsnevndini vóru:

Fyri Sovjetsamveldið í felagsnevndini: V. M. Sosno

Fyri Føroyar í felagsnevndini: Kjartan Hoydal, Hjalti í Jákupsstovu

Á fimtanda fundinum í felagsnevndini umboðaðu tær í skjali 1 nevndu samráðingarnevndirnar Føroyar og Sovjetsamveldið.

III *Felagsnevndin samtykti hesa dagsskrá:*

1. Fundarseta
2. Dagsskrá samtykt
3. Áseta kvotur fyri sínámillum fiskiveiði í 1992.
4. Áseta tal av loyvum fyri 1992.
5. Reglur um loyvi fyri sínámillum fiskiveiði í 1992,
   Fráboðan frá fiskiskapi í sovjetskum sjóøki og í føroyskum sjóøki og at láka treytir fyri fiskiskapi.
6. Umrøða felagsætlanina fyri royndarfiskiskapi og fiskirannsóknarligum arbeiði í 1992.
7. Ymist
8. Fundarslit.

IV Viðvíkjandi máli 3 á dagsskránni komu partarnir ásamt um at geva hvør øðrum hesar sínámillum veiðimøguleikar í 1992:

a. Føroysku myndugleikarnir loyva sovjetskum skipum at fiska upp til 120000

tons av svartkjafti (íroknað hjáveiði av makreli) til matna í føroyskum fiskiøki.

b. Sovjetski partarin loyvir føroyskum skipum at veiða tosk, hýsu og flatfisk, íroknað hjáveiði av øðrum fiskasløgum, og rækjur í búskaparøki Sovjetsamveldisins, uttan fyri 12 fjórðingar í Barentshavinum. Í felagsøkinum í Barentshavinum kunnu veiðast 8.360 tons av toski og hýsu og upp til 836 tons í hjáveiði, 3.500 tons av flatfiski, 3.000 tons av rækjum, 1.000 tons av hørpuskel 20.000 tons av lodnu í tíðini 1/1 - 30/4 1992.

Viðvíkjandi møguleikunum fyri framhaldandi føroyskari veiði eftir toski í Eystrasalti í 1992 varð upplýst frá sovjetskari síðu, at tað ikki var møguligt at loysa henda spurning nú. Partarnir samdust um at koma aftur til málið seinni.

V Viðvíkjandi máli 4 á dagsskránni komu partarnir ásamt um hetta:

a. Sovjetsku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum alt árið 1992 at veiða tosk, hýsu, rækjur, skeljar, lodnu og flatfisk á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og felagsøkinum í Barentshavinum.

b. Føroysku myndugleikarnir geva 26 sovjetskum skipum loyvi at veiða svartkjaft (íroknað hjáveiðit av makreli) í tíðarskeiðinum 1. apríl til 31. oktober (av hesum kunnu á økinum ásett í punkti VI b í tíðarskeiðinum 15. apríl til 31. mai, tó í mesta lagi vera 13 skip) og 15 sovjetskum skipum í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. mars og 10 í tíðarskeiðinum 1. november til 31. desember á føroyskum fiskiøki.

VI Viðvíkjandi máli 5 á dagsskránni varð hetta nevnt:

a. Báðir partar gjørdu hvør annan kunnugan við tær reglur, ið galda fyri fiskiskap ávikavist á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og á føroyskum fiskiøki.

b. Hvør partur ansar eftir, at skip hansara halda tær lógir og reglur, ið galda fyri fiskiskap á økjum, ið eru undir lóggávu hjá hinum partinum. Serligar reglur kunnu verða settar í verk í tíðarskeiðinum mars til og við juni fyri svartkjaftaveiðuna á føroyskum fiskiøki fyri at sleppa undan troðkan, meðan fiskiskapurin fer fram á einum lutfalsliga avmarkaðum øki. Mest loyvda hjáveiða av makreli er 10% av tí nøgd av svartkjafti, sum sovjetskum skipum verður loyvt at veiða.

c. Viðvíkjandi mannagongdini at geva loyvi til fiskifør til sínámillum fiskiskap á økjum undir sovjetskari og føroyskari lóggávu komu partarnir ásamt um, at teir fyri árið 1992, ikki seinni enn 15 dagar innan fiskiskapurin byrjar, verða at senda yvirlit yvir tey skip, talan er um. Leitingarskip skulu fráboðast fyri seg og verða ikki tald uppí talið av skipum nevnt undir V b. Hvørt

samdøgur senda leitingarskipini føroyskum myndugleikum upplýsingar eftir serligari skipan.

d. Partarnir komu ásamt um, at neyðug umbøn um at umskifta loyvi til skip verða um telex, sum verður sent til Murmansk ella Tórshavn, eftir sonu nammagongd sum árini frammanundan, áðrenn fiskiskapurin byrjar.

e. Báðir partar verða at nýta telex, at loysa allar operativar spurningar í sambandi við sínámillum fiskiskapin. Sovjetsk skip siga frá 24 tímar undan tey koma inn á føroyskt fiskiøki.

f. Partarnir vóru samdir um, at skipini í loyvisspurningum helst skulu nýta Murmansk ella Tórshavn sum arløguhavnir.

VII Viðvíkjandi máli 6 á dagsskránni komu partarnir ásamt um hetta:

Føroyski parturin gevur 5 sovjetskum skipum loyvi til royndarfiskiskap á føroyskum fiskiøki djúpri enn 700 m. Upp til 3 skip kunnu fáa loyvi samstundis.

Frá føroyskari síðu verður loyvt einum av teimum trimum omanfyri nevndu skipum at reka djúpvatnsroyndarfiskiskap á Outer Bailey Bank á dýpi ímillum 500 og 700 m, tó soleiðis at í mesta lagi 200 tons av djúpvatnsfiski verða veidd har.

Føroysku myndugleikarnir loyva 5 sovjetskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir høgguslokki á føroyskum fiskiøki á teimum leiðum, har tað er loyvt sovjetskum skipum at veiða svartkjafl.Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Royndarveiðan eftir høgguslokki má ikki fara upp um 2.000 tons.

Um so er, at einki er til av høgguslokki, kunnu nevndu skip í juni - august veiða av tillutaðu nøgdini av svartkjafti (fróknað hjáveiðu av makreli), sum sovjetsk skip hava loyvi at veiða á fiskiøki Føroya. Tá lagt verður um til annan fiskiskap, skulu skiparnir á nevndu skipum í góðari tíð boða viðkomandi føroysku myndugleikunum frá hesum.

Sovjetski parturin loyvir einum føroyskum skipi at reka royndarfiskiskap eftir hørpusket. Hetta tíðarskeið skal veiðan eftir hørpusket ikki fara upp um 1.000 tons.

Sovjetskir myndugleikar fara ikki seinni enn 10. februar 1992 at siga føroyskum myndugleikum frá, á hvørjum leiðum og í hvørjum tíðarskeiðum hesin royndarfiskiskapur kann vera. Við hesum skipi kunnu vera upp til 2 sovjetskir serfrøðingar.

d. Partarnir komu ásamt um um møguleiki býðst og eftir navni avtalu at kanna spurningin, um at reka royndarfiskiskap eftir atlanto-skandiskari síld í fiskiøkjunum hvør hjá øðrum.

Hvør partarin skal í góðari tíð um telex leggja ætlanirnar fyri tílíkum royndararbeiðum fram fyri hin partin.

VIII Grundað á grein 7 í sáttmálanum frá 27. november 1977 millum stjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri øðrumegin og Sovjetsamveldið hinumegin samdust partarnir um at arbeiða fyri víðkaðum samstarvi og at skipa fyri neyðugum samstarvi millum feløg og virki innan fiskivinnuna hjá báðum pørtum, at felags gagni og við serligum denti á:

1. Møguleikum fyri at føroysk skip kunnu fiska við sovjetskum fiskiloyvi upp til 3000 tons av botnfiski.
2. Møguleikum fyri at føroysk skip kunnu útvega fisk til sovjetsk virki og skip og at sovjetsk skip kunnu útvega fisk, skeljadjór o.a. til føroysk virki og skip.
3. Samstarv um vitan um fiskastovnar, fiskastovnsrøkt, royndir við ymiskum fiskireiðskapi, framleiðslutøkni innan fiskifdnaðin, skipatøkni, umvælingar og skipasmíð, fiskivinnubúskap, leiðslu innan fiskifdnaðin á sjógvi og landi, fiskaaling v.m. Serliga at skipa fyri dyggum og skjótum sambandi, tá spurningar koma fram og finna samstarvsformar millum fyritøkur hjá báðum pørtum.

Partarnir seta limir í ein varandi arbeiðsbólk, sum skal skipa hesi viðurskifti og gera samskipanina so dygga sum gjørligt. Partarnir boða hvørjum øðrum frá limum í hesum arbeiðsbólki ikki seinni enn í januar 1992.

Í sambandi við mál 7 á dagsskránni - ymist - søgdu partarnir frá, at teir mettu tað vera ynskjandi, at vísindaliga samstarvið varð víðkað, harímillum lutur partanna í fleirilanda vísindaligu samstarvi um svartkjaft og síld, m.a. við tí í hyggju at áseta TAC fyri hesar veiður.

Viðvíkjandi atlanto-skandisku síldini eru partarnir samdir um, at boða frá einum og hvørjum tilburði av veiðu eftir hesum fiskaslagi undir fiskiskapi, royndarfiskiskapi ella havrannsóknum á fiskiøkjunum hvør hjá øðrum.

IX Partarnir samdust um, at sekstandi fundurin í felagsnevndini skuldi haldast í Murmansk í Sovjetsamveldinum í seinnu helvt av 1992.

Dagsskráin fyri sekstanda fundi í felagsnevndini verður løgd til rættis ígjøgnum stjórnarumboð.

Henda frásøgn er skrivað í Tórshavn 10. desember 1991 á føroyskum, donskum og russiskum. Allir tekstir hava sama gildi.

Umboð fyri Føroyar í felagsnevndini:

Kjartan Hoydal (sign.)

Varaumboð fyri stjórnina í samveldinum av Sosialistiskum Sovjetríkjum í felagsnevndini:

V. M. Sosun (sign.)

Skjal 1

Føroysku umboðini á 15. fundi í føroysku-sovjetsku felags-nevndini um sínámillum fiskivinnumál í Tórshavn 9.-10. desember 1991.

Kjartan Hoydal - fiskivinnustjóri, Føroya Landsstýri, umboð í felagsnevndini
Hjalti í Jákupsstovu - stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, umboð í felagsnevndini

Ráðgevarar:

Ulla S. Wang - fulltrúi, Føroya Landsstýri
Árni Olafsson - ráðgevi, Uttanríkismálaráðið
Bozena Rasmussen - tulkur
Kaj P. Mortensen - fulltrúi, Føroya Landsstýri
Jóhan Ziskason - stjóri, Vaktar- og Bjargingartænastan
Jóhan Páll Joensen - skipari, Føroya Reiðarafelag
Eiler Jacobsen - reiðari, Føroya Reiðarafelag
Svend Thulesen - stjóri, Føroya Reiðarafelag
Mortan Johannesen - skipari, Føroya Reiðarafelag

Sovjetsku umboðini á 15. fundi í føroysku-sovjetsku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál í Tórshavn 9.-10. desember 1991.

V. M. Sosno - umboð fyri sovjetsku stjórnina, varafiskimálaráðharri.
E. I. Zaitsev - varaumboð í sovjetsku-norsku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál fyri sovjetsku stjórnina.
G. N. Suhov - serfrøðingur í sovjetsku-norsku felagsnevndini, limur í føroysku-sovjetsku felagsnevndini.
A. V. Rodin - stjóri, "PINRO", limur í føroysku-sovjetsku felagsnevndini.
V. F. Torohov - varastjóri fyri framleiðslu, "SEVRYBA", limur í føroysku-sovjetsku felagsnevndini.
B. I. Kulev - leiðari á deildini fyri altjóða samvinnu, Sovjetska Fiskimálaráðið
V. A. Belobragin - sendifulltrúi á sovjetsku sendistovuni í Keypmannahavn.
A. V. Vilov - blaðstjóri, "RYBNY MURMAN", umboð fyri fiskimannafelagið í norðara partinum.

Skjal 2

Felagsætlan fyri vísindaligum samstarvi millum Føroyar og Sovjetsamveldið.

Í 1991 hava sovjetsk vísindalig rannsóknar- og leitingarskip bildið fram við at kanna fiskastovnarnar og tey serstøku viðurskiftini, ið galdandi eru fyri fiska-

stovnarnar svartkjaft, makrel og høgguslokk á føroyskum fiskiøki. Harumframt vórðu gjørdar ekkómetingar av svartkjaftastovninum í opnu økjunum í Norska-havinum, á norskum og føroyskum havøki.

Kanningar av atlanto-skandiskari sild eru gjørdar á gýtingarøkjunum.

Partarnir tosaðu um úrslitini frá felags rannsóknum og løgdu serligan dent á nyttuna av neyvum samstarvi og á týdningin av lívfrøðiligum tilfari fyri at loysa praktiskar spurningar viðvíkjandi havfiskiskapinum.

Partarnir komu ásamt um hesa ætlan fyri rannsóknarsamstarvið í 1992.

1. *Rannsóknarferðir fyri meting av svartkjaftastovninum og savning av havrannsóknarligum og lívfrøðiligum tilfari.*

Í 1992 (mars juni) er ætlanin at fara undir at meta svartkjaftastovnarnar á gýtingarøkjunum og at kanna svartkjaftastovnarnar akustiskt í vakstrartíðini. Arbeiðið við at betra aldursgreiningarnar hjá svartkjaftinum verður ført víðari samsvarandi tilráðingum frá svartkjafta-arbeiðsbólkinum í ICES.

2. *Rannsóknarferðir til at kanna og meta makrel- og høgguslokkastovnarnar og savna havrannsóknarligt og lívfrøðiligt tilfar.*

Í 1992 er ætlanin at halda fram við felagsarbeiði til at meta makrel- og høgguslokkastovnarnar á føroyskum sjóøki. Rannsóknirnar skulu verða gjørdar við einum sovjetiskum havrannsóknarskipi, har føroyskir serfrøðingar eru við.

Kanna útbreiðslu og gýtingareffektivitetin hjá atlantoskandiskari sild.

Báðir partar skulu seta í verk kanningar av sildacindum samhært ætlanunum hjá viðkomandi fiskirannsóknarstovum.

Føroysku myndugleikarnir loyva royndarfiskiskapi eftir atlanto-skandiskari sild við einum skipi við drívgørnum á føroyskum sjóøki. Í hesum sambandi kunnu føroyskir serfrøðingar vera umborð. Partarnir senda hvør øðrum úrslitini frá kanningunum við posti.

4. *Havrannsóknir til at kanna lívfrøðiligt ríkidømi av ríevni á dýpdum størri enn 500-700 m.*

Á vetri og vári 1992 heldur eitt sovjetiskt havrannsóknarskip fram við kanningunum av djúpbavsfiskastovnum á føroyskum sjóøki.Við Outer Bailey Banka halda fram kanningar av fiskasløgum, ið liva á markinum ímillum grunt og djúpt vatn (500-2000 m), fyri at meta um fiskastovnarnar og veiðimøguleikarnar har. Rannsóknirnar verða gjørdar við einum sovjetiskum havrannsóknarskipi, har føroyingar eru við.

Partarnir geva hvør øðrum upplýsingar um úrslitini frá hesum fiskirannsóknum á næsta regluliga fundi í føroysk-sovjetsku felagsnevndini.

5. *Samstarv til at kunngera rannsóknarúrslit.*

Teir sovjetisku og føroysku serfrøðingarnir fara at skriva greinir um svartkjaft, djúphavsfisk og oceanografi á sjóøki Føroya við tí í hyggju at kunngera greinirnar í vísindaligum tíðarritum. Umbýtið av havfrøðiligum tilfari, sum er innsavnað á fiskiveiðiøkjum partanna, verður gjørt á næsta regluliga fundi í føroysku-sovjetsku felagsnevndini.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 69/1991: Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1992.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. desember 1991 og eftir 1. viðgerð 18. desember 1991 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur sambært § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 á fundi tann 19. desember 1991 givið fyribils góðkenning av málinum.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

70. Søla av fastogn landsstýrisins í Tórshavn

Uppskot

til

Løgtingslóg um søla av parti av fastogn landsstýrisins í Tórshavn.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at selja setrúsini matr. nr. 920 e, Landavegi 35, Tórshavn

Lagtingslov om salg af del af landsstyrets faste ejendom i Tórshavn.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at sælge beboelseshus matr. nr. 920 C, Landavegur 35, Tórshavn.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar

Húsini eru 13,20 x 8,00 m í einari hædd. Grundstykkið er 446 m²

Miðskeiðis í sjeytiárunum keypti landsstýrið hús í J. C. Svaboesgøtu í sambandi við Støðisútbúgvingina.

Eigarin gjørdi í hesum sambandi avtalu við landsstýrið um leigu av hústnum Landavegur 35, so leingi hon hevði tørv á teimum.

Eigarin hevur nú fingið pláss á ellisheimi, og hevur hon tí sagt upp leigumálið, og standa húsini sostatt tóm.

Landsstýrið ognaði sær húsini í 1953 og vórðu tey í mong ár nýtt til bústað hjá fólki við tilknýti til sjúkrahúsverkið.

Í løtuni tykist eingin orsøk vera til, at tað almenna skal eiga búsini og fyri at sleppa undan útreiðslum til viðlíkahald, trygging o.a., verður hildið skilabest at selja húsini til hægstbjóðandi.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 70/1991: Søla av fastogn landsstýrisins í Tórshavn.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars 1992 beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) er samdur við landsstýrinum í, at tað hevur onga meining at eiga bús. ið ikki kunnu nýtast hjá umsitingini ella nøkrum almennum stovni. Meirilutin kann tí taka undir við at matr. nr. 920e, Landavegur 35 Tórshavn verður selt til hægstbjóðandi og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) setir eingi uppskot fram.

71. Millumbylgjusendarin

Uppskot

til

samtyktar

I Álagt verður landsstýrinum at játta 1 mió. kr. til raksturin av millumbylgjusendaranum fyri árið 1992.

II Álagt verður landsstýrinum at skipa soleiðis fyri, at SEV veitir millumbylgjusendaranum neyðuga orku og at hendan orkunýtsla á ongan hátta hevur óhepnar tekniskar avleiðingar fyri aðrar orkunýtarar hjá SEV.

Viðmerkingar:

Raksturin av millumbylgjusendaranum í Akrabergi hevur higartil verið goldin av landskassanum. Hendan skipan var frá og við verandi fíggjarlóg broytt til, at landsstýrið játtaði 1,5 mió. kr. í stundingi til raksturin av útvarpinum íroknað sendaran. Tá ið hendan avgerð varð tikin, noyddist leiðslan í útvarpinum at sløkkja sendaran av og á.

Tá ið hendan avgerð varð tikin færttist, at landsstýrið fór at leita eftir peningi fyri at bøta um støðuna.

Landsstýrið fann ongan pening til hetta endamál, og er loysnin tí hon, at útvarpið ikki skal útvega sær eitt sendirør fyri 400.000 kr. at hava til at taka, tá verandi rør verður skift helst í næstu framtíð.

Úrslitið verður tá, at fer tað næsta rørið, verður sendarin sløktur. Eitt tílíkt rør kann senda í 4.000 tímar, og eru hesir longu nýttir. Síðani kann tað halda enn eina tíð, eins og tað kann fara nær tað skal vera, eins og eitt nýtt rør kann fara, nær tað skal vera. Bíleggingartíðin er upp í 10 vikur.

Á fíggjarlógini fyri 1992, sum samgongan hevur samtykt, resta góðar 80 mió. kr. í, fyri at fáa endarnar at røkka saman. Hetta upphædd kundi eftir øllum at døtna ikki førkast eitt vet, so at vit fingu trygd fyri, at sjómenn okkara hoyrdu útvarpið.

Eisini er landsstýrið nøgt við, at sendarin bert sendir við hálvari styrki, sum er 100 kw, og sum kostar 204 kr. um tíman. 100 kw er nóg mikið um okkara leiðir og hoyrist eins væl og 200 kw sendistyrki, sum kostar 415 kr. um tíman. 100 kw sendistyrki er hinvegin ikki nóg mikið á fjarleiðum, sum sendarin varð bygdur til.

Sagt verður bæði úr Barentshavinum og undan Eysturgrønlandi, at 100 kw sendistyrkin ikki hoyrist nóg væl.

Um sent verður við 200 kw styrki og við DCC skipanini, sum sendarin er fyri reikaður til, so kostar hetta ikki meiri í streymnýtslu enn verandi skipan, tá ið hon sendir við 100 kw.

DCC skipanin krevur nýggjan kaðal frá SEV, sum skal leggjast frá verkinum í Vági, men hevur landsstýrið kortini ongar fyrireikingar gjørt, so at henda skipanin kann koma at virka.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 3 mió. kr. til menningarhjálp. Tjóðveldisflokkurin heldur, at lítið samsvar er í at taka ímóti fígging uttaneftir, til at reka samfelagið fyri og so sjálvir nýta part av hesi upphædd til at endurfíggja onnur samfeløg fyri.

Tað finst eingin reglugerð fyri teimum treytum, ið settar verða fyri menningarhjálp, su einki skuldi forað fyri, at henda hjálp m.a. fór til føroyskar fiskimenn, sum í mánaðir ikki eru førir fyri at fylgja við í menningin av egnum samfelag.

Tjóðveldisflokkruin heldur, at teir føroyingar, sum veruliga leggja rygg til at reka hetta samfelag, og eru langt av landi skotnir, hava uppíborið í minsta lagi somu sømdir sum vit ið heima ganga hvønn dag.

Mælt verður til at 1 mió. kr. verða játtaðar av t.d. hesum 3 mió. kr. til menningarhjálp, til at reka útvarpssendaran fyri.

Ein avleiðing av teirri stóru streymnýtsluni hjá millumbylgjusendarantum er, at Sumbiar bygd hevur sera óstøðuga streymveiting. Hetta hevur aftur við sær, at stórar umvælingarútreiðslur eru av teldum, sjónvørpum og húsarhaldstólum.

Verður kaðal lagdur beinleiðis frá elverkinum í Vági til millumbylgjusendaran, verða allar bygdir í Suðuroy nervaðar av óstøðugari streymveiting.

Tí eigur løgtingið at áleggja landsstýrinum, at taka upp samráðingar við SEV um hesi viðurskifti vísandi til, at SEV bert í heilt lítlan mun hevur verið við í viðgerðini av hesum máli.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 71/1991: Millumbylgjusendarin.

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 28. januar 1992 og undir 1. viðgerð 6. februar 1992 beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Í hesum máli eru tvinni uppskot til samtyktar. Í fyrra uppskotinum verður álagt landsstýrinum at játta eina millión krónur til rakstur av millumbylgjusendaranum fyri árið 1992.

Í uppskoti II verður eisini álagt landsstýrinum at skipa so fyri, at SEV veitir millumbylgjusendaranum neyðuga orku, uttan at saka aðrar el-nýtarar á nakran hátt.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt uppskotini bæði og roynt hevur verið at fingið tey væl lýst.

Uppskot I snýr seg um raksturin av sendarunum fyri árið 1992. Sum tað verður víst á í viðmerkingunum, so noyddist leiðsla útvarpsins at sløkkja sendaran av og á, eitt skifti, av tí at ov lítið var sett á figgjarlógina til rakstur av millumbylgjusendaranum, sum áður hevði verið goldin av landskassanum beinleiðis.

Ein loysn (fyribilsloysn) varð tó skjótt funnin, soleiðis at sendarin sendi aftur við somu styrki, sum hann altíð hevur gjørt. Nevndin hevur fingið váttan fyri, at tað verður sent við millumbylgjusendaranum alla tíðina, meginpartin av tíðini við hálvari megi, t.v.s. við 100 Kw, tó tíðindasendingarnar á miðdegi og um kvøldið við fullari megi, t.v.s 200 Kw.

Upplýsast kann her, at landsstýrið og figgjarnevndin hava strikað eina upphædd upp á 4,6 mió. kr., sum landskassin ígjøgnum nøkur ár hevur lagt út fyri Útvarp Føroya. Hetta lættir um rakstur Útvarpsins.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í eitt meiriluta og eitt minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Birgir Danielsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Finnhogi Arge og Flemming Mikkelsen) er falt greiður yvir, at eingin varandi loysn er funnin á teimum trupulleikum, sum Tjóðveldisflokkurin vísir á í fyrra uppskoti sínum til samtyktar, har ið skotið verður upp, at meirilutin heldur seg hava fingið váttan fyri, at sent verður á sama støði, eins væl og tað hevur verið.

Viðvíkjandi uppskoti II skilir nevndin soleiðis, at løgtingið skal áleggja landsstýrinum at skipa so fyri, at SEV gevur neyðuga orku til millumbylgjusendaran.

Annars vísir uppskotsstillarin á nakrar tekniskar spurningar, sum eftir latan uppskotstillarans áttu at betra um støðuna hesum viðvíkjandi.

> *Sagt verður:* "Um sent verður við 200 Kw styrki og við DDC-skipanini, sum sendarin er fyrireikaður til, so kostar hetta ikki meiri í streymnýtslu enn verandi skipan, tá ið hon sendir við 100 Kw.
>
> DCC-skipanin krevur nýggjan kaðal frá SEV, sum skal leggjast frá verkinum í Vági, men hevur landsstýrið ongar fyrireikingar gjørt, so at henda skipanin kann koma at virka."

Samanumtikið heldur meirilutin, at í sambond við uppskot II eru fleiri rættiliga áhugaverdir spurningar, men vísir samstundis á at teir eru av tekniskum slagi, sum serkunnleikin eigur at taka sær av.

Undir fyrstu viðgerð varð eisini víst á, at nóg stór motororka stendur still, ið er ætlað at taka til, um ravmagnið skuldi svikið.

> *Sagt varð:* "Spurningurin er, um tað er ein gongd leið, at lata motorin ganga alla tíðina, tí hetta verður uttan iva líka bíligt. Vakt frá maskinrúmi er vanlig."

Meirilutin heldur, at hetta eru áhugaverdir spurningar, sum landsstýrið eisini eigur at taka upp við avvarðandi partarnar. Við hesum viðmerkingunni mælir meirilutin til at samtykkja uppskot I við hesi broyting. Aftaná orðið "játta" verður sett 17 mió. kr. Til uppskot II setir sami meirilutin einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) mælir til at samtykkja uppskot Tjóðveldisflokksins.

72. Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

Uppskot

til

Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1991 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu.

Eisini verða møguleikar fyri at borga vanligt fyri goymslulánum, bæði fyri rávørur og lidna framleiðslu, til niðursjóðingarvirki, fiskaroykivirki og til tøtingarvirkir í Føroyum. Borgan verður givin fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

Lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1991 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsila, produkter af blåhvilling og agn på lager. Også bliver det muligt at garantere simpelt for lagerlån, både for råvarer og for færdigproduktion, til konserveringsvirksomheder, fiskeryggningsvirksomheder og til fabrikker der tilvirker uldtøj på Færøerne. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% af lånsværdien.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Viðmerkingar

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 24 frá 24. apríl 1991, sum fer úr gildi 31. desember 1991, sí løgtingsmál nr. 41/1990.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, Løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

Higartil í fíggjarárinum 1991 eru borganir veiltar fyri 30 mió. kr.

Álit

(

Løgtingsmál nr. 72/1991: Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v. m. á goymslu.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. januar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 6. februar 1992 beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur m.a. fingið upplýst, at pr. 11. februar 1992, er tað bert eitt virki, sum hevur landskassaveðhald sambært løgtingslóg nr. 24 frá 24. apríl 1991, um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu. Veðhaldsupphæddin var tilsamans kr. 27 milliónir.

Annars heldur nevndin, at landsstýrið eigur at umhugsa, at lógin skal endurnýggjast aftur í tí líki, hon hevur í dag.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, tó við teirri broyting, at "tøtingarvirkir" verður broytt til "tøtingar- og skinnvirkir".

Samsvarandi hesum setir nevndin tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1. verður orðið "tøtingarvirkir" broytt til "tøtingar- og skinnvirkir".

I § 1. sættes efter ordet "uldtøj" og "skindvarer".

73. Endurskoðan av tryggingar-viðurskiftunum her á landi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skunda undir arbeiðið at endurskoða tryggingar-viðurskifti her á landi, og at hetta verður gjørt við alliti til, at tænastustøði hækkar.

Viðmerkingar

Áður hevur av ymiskum flokkum og tingmonnum verið lagt uppskot fram á ting, sum høvdu til endamáls at broyta trygginarviðurskiftini her á landi.

Uppskot um at avtaka einarrættin hjá tryggingini hevur somuleiðis verið frammi - tó uttan at vinna fram.

Hóast tað er ein sannroynd, at monopolstovnar aðrastaðni í stóran mun hava yvirlivað seg sjálvar, og kapping stovnanna millum hevur vunnið fram til gagns fyri brúkaran, so tykist "monopolið" her á landi at trívast væl - dúgliga fjálgað av politiskum myndugleikum.

Hóast heilt nyttuleyst hjá andstøðupolitikkara, enn einaferð, at koma við uppskoti um at avtaka einkarrættin hjá tryggingini, so má ásannast, at tíðin nú er komin frá politiskari síðu, at seta neyðug tiltøk í verk, sum hava til endamáls at tryggja landsins borgarum (tryggingartakaranum) betri sømdir og hægri tænastustøði í tryggingarviðurskiftum sínum.

Meginreglan her átti at verið, at tryggingarfyritøkurnar vórðu til fyri borgarans skuld og ikki øvugt - og ikki minst, tá talan er um monopolstovnar, hvørs einkarrættur er vardur av landsins lógum!

Fyri knøppum ári síðan var tað Sambandsflokkurin, sum legði uppskot á ting. Hetta uppskot hevði til endamáls, at avtaka einkarrættin hjá tryggingini og at sundurliða tryggingarstovnin.

Málið vann ikki frama, men varð av samgongumeirihlutanum í nevndini víst á, at landsstýrið "arbeiddi við trygginarspurningunum, soleiðis sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum undir 1. viðgerð av málinum hevði upplýst".

Havandi í huga, at nærum eitt ár nú er gingið síðan upplýst varð, at "landsstýrið arbeiddi við" loyvir uppskotsstillarin sær at heita á landsstýrið, at skunda undir og taka neyðug stig til, at trygginarviðurskiftini her á landi sum skjótast koma í slíka legu, sum av sonnum kann sigast at vera brúkaravinarlig.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 73/1991: Endurskoðan av tryggingarviðurskiftunum her á landi.

Málið er lagt fram av Tordi J. Nielasen tann 20. januar 1992 og undir 1. viðgerð 30. januar 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin legði fram álit í málinum 6. februar 1992.

Undir 2. viðgerð varð málið beint aftur í fíggjarnevndina orsakað av, at sagt varð frá, at ikki allar upplýsingar vóru komnar við í álitið.

Undir 1. viðgerð varð upplýst av landsstýrismanninum, at landsstýrið arbeiðir við málinum. Í hesum sambandi varð eisini sagt, at álit um tryggingarviðurskiftini í Føroyum fyriliggur.

Nevndin hevur undir viðgerð býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirlutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eitki uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Lisbeth L. Petersen) mælir til at samtykk-

74. Loysn av sáttmálaósemju

Uppskot

til

Løgtingslóg um leingjan av ávísum lønarsáttmálum.

§ 1.

Sáttmálarnir um lønar- og arbeiðsviðurskifti v.m. millum Føroya Skipara og Navigatørfelag og Føroya Reiðara- felag, ið vóru galdandi til 1. januar 1992, verða longdir at galda til 1. januar 1993 við hesum broytingum:

1. Pkt. XIII í sáttmálanum fyri rækjuveiðu við frystiskipum verður 3. stk. orðað soleiðis:

Lagtingslov om ændring af visse lønoverenskomster m.v.

§ 1.

Overenskomsterne om løn og arbejdsvilkår m.v. mellem Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag, der var gældende indtil 1. januar 1992, forlænges til den 1. januar 1993 med følgende ændringer:

1. I pkt. XIII i overenskomsten for rejefangst med fryseskibe affattes stk. 3 saledes:

"Tá rækjur verða pakkaðar í smærri enn 5 kg eskjur er kostnaðurin av hesum pakkiútreiðslum loyvdur frádráttur."

2. "Tá 5 mans eru við ísfiskatrolarum verður samlaði manningarparturin tann sami sum við 6 monnum. Fiskiparturin og yvirmannapartarnir eru við í samlaða niðurskurðinum av hýroprocentinum helvt um helvt. Tá 4 mans eru við verður samlaða hýruprocentið á sama hátt avmarkað til tað, sum var galdandi fyri 5 mans."

3. "Í sáttmálanum har proviantur ikki er loyvdur frádráttur frammanundan, fer proviantur av óbýttum við í mesta lagi kr.7000 fyri hvønn mann hvønn dag. Upphæddin verður at prístalsviðgera við prístalinum tann 01.01.1992 sum grundarlagi."

4. Í sáttmála VII fyri veiðu við hekkutrolarum á saltfiska- og flakaveiðu verða gjørdar hesar broytingar:

"*Fyrsta stigið:*
fyri útrokning av bonus er tá báturin fyri túrin veiðir fyri millum 10 og 20 milj. kr. Í hesum føri skal bonus sum prosent verða roknað av tí avlopi, ið kemur fram aftaná frádrátt av felagsútreiðslum.

Annað stigið:
er eitt ásett prosent av tí søluvirði, ið báturin veiðir tann túrin millum 20 og 30 milj. kr.

Triðja stigið:
er eitt ásett prosent av tí søluvirði, ið báturin veiðir tann túrin meira

"Da rejer bliver pakket i mindre end 5 kg. æsker, er omkostningerne af disse pakningsudgifter tilladt fradrag."

2. "Når der er 5 mand med ferskfisketrawlere, bliver den samlede mandskabsandel den samme som med 6 mand. Fiskeandelen og officersandelene er med i den samlede nedskæring af hyreprocenten med halvdelen fra hver. Da 4 mand er med, bliver det samlede hyreprocent på samme måde begrænset til det, som var gældende for 5 mand."

3. "I overenskomsten, hvor provianten ikke er tilladt som fradrag forinden fragår provianten af udelt fangst med højst 70,00 kr. for hver mand hver dag. Beløbet bliver prisregulerel på grundlag af prisniveauet 01.01.1992."

4. I overenskomst VII for fangst med hakketrawlere pa saltfiske og filétfangst foretages følgende ændringer:

"*Første grad:*
ved udregning af bonus er, da mand en hver tur fanger for mellem 10 og 20 mio. kr. I dette tilfælde skal bonus som procent beregnes af det overskud, der fremkommer efter fradrag af fællesudgifter.

Anden grad:
er et fastlagt procent af den salgsværdi båden fanger den tur mellem 20 og 30 mio. kr.

Tredie grad:
er et fastlagt procent af den salgsværdi, båden fanger den tur mere

enn 30 milj. kr. Prosentini í bonus fyri tey trý stigini eru fyri skipara, 1. stýrimann, 2. stýrimann og bátsmann/3. stýrimann, sum niðanfyri standandi talva vísir:

Samtykt sáttmála VII fyri veiði við hekkitrolarum á saltfiska- og flakaveiðu er henda talva galdandi:

Yvirmenn % av avlopi

Stig:	**1.**	**2.**	**3.**
Skiparin	1,00%	1,50%	2,00%
1.stýrim.	0,40%	0,60%	0,85%
2.stýrim. bátsm./	0,36%	0,52%	0,72%
3.stýrim.	0,15%	0,25%	0,25%"

§ 2.

Sáttmáli um lønar- og arbeiðsviðurskifti millum Maskinmeistarafelagið og Føroya Reiðarafelag, ið var galdandi til 1. januar 1992, verður longdur at galda til 1. januar 1993 við hesum broytingum.

1. Í § 21, 1. stk., verður sett inn:
"Tá rækjur verða pakkaðar í smærri enn 5 kg eskjur, er kostnaðurin av hesum pakkiútreiðslum loyvdur frádráttur."
2. "Tá 5 mans eru við ísfiskatrolarum verður samlaði manningarparturin tann sami sum við 6 monnum. Fiskiparturin og yvirmannapartarnir eru við í samlaða niðurskurðinum av hýruprocentinum helvt um helvt. Tá 4 mans eru við, verður samlaða hýruprocentið á sama hátt avmarkað til tað, sum var galdandi fyri 5 mans."

end 30 mio. kr. Procenterne i bonus for de 3 grader omfatter skipper, 1. styrmand, 2. styrmand og bådsmand/3. styrmand, som nedenforstående tavle angiver:

I henhold til overenskomst VII for fangst med hækketrawlere på saltfiske- og filétfangst er nedenforstående tavle gældende:

Officerer % af overskud

Grad:	**1.**	**2.**	**3.**
Skipper	1,00%	1,50%	2,00%
1.styrmand	0,40%	0,60%	0,85%
2.styrmand bådsmand/	0,36%	0,52%	0,72%
3.styrmand	0,15%	0,25%	0,25%"

§ 2.

Overenskomst om løn ogarbejdsvilkår m.v. mellem Maskinmeistarafelagið og Føroya Reiðarafelag, der var gældende indtil 1. januar 1992 forlænges indtil den 1. januar 1993 med følgende ændringer:

1. I § 21, stk. 1, bliver tilføjet:
"Da rejer bliver pakket i mindre end 5 kg. æsker, er omkostningerne af disse pakningsudgifter tilladt fradrag."
2. Når der er 5 mand med ferskfiskehawlere, bliver den samlede mandskabsandel den samme som med 6 mand. Fiskeandelen og officersandelen er med i den samlede nedskæring af hyreprocenten med halvdelen fra hver. Da 4 mand er med, bliver det samlede hyreprocent på samme måde begrænset til det, som var gældende for 5 mand."

3. "Í sáttmálum, har proviantur ikki er loyvdur frádráttur framumanundan, fer proviantur av óbýttum við í mesta lagi kr. 70,00 fyri hvønn mann hvønn dag. Upphæddin verður at prístalsviðgera við prístalinum tann 01.01.1992 sum grundarlagi."

4. Í § 24 fyri veiðu við hekkutrolarum á saltfiska- og flakaveiðu verða gjørdar hesar broytingar:

"*Fyrsta stig:*
fyri útrokning av bonus er, tá báturin fyri túrin veiðir fyri millum 10 og 20 milj. kr. Í hesum føri skal bonus sum prosent verða roknað av tí avlopi, ið kemur fram aftaná frádrátt av felagsútreiðslum.

Annað stig:
er eitt ásett prosent av tí søluvirði, ið báturin veiðir tann túrin millum 20 og 30 milj. kr.

Triðja stig:
er eitt ásett prosent av tí søluvirði, ið báturin veiðir tann túrin meira enn 30 milj. kr."

§ 3.

Prísískoytið verður í sáttmálaskeiðinum sambært §§ 1 og 2 at býta á sama hátt sum prísískoyti, rakstrar- og manningarstuðningur varð býttur áðrenn 1. januar 1992.

§ 4.

Longdu sáttmálarnir kunnu verða uppsagdir av báðum pørtum við í minsta lagi 3 mánaða ávarðing til ein 1. januar.

3. "I overenskomsten, hvor provianten ikke er tilladt som fradrag forinden, fragår provianten af udelt fangst med højst 70,00 kr. for hver mand hver dag. Beløbet bliver prisalsreguleret på grundlag af prisallet 01.01.1992."

4. I § 24 for fangst med hækketrawlere på saltfisk og filétfangst foretages følgende ændringer:

"*Første grad:*
ved udregning af bonus er, da bådden pr. tur fanger for mellem 10 og 20 mio. kr. I dette tilfælde skal bonus som procent beregnes af det overskud, der fremkommer efter fradrag af fællesudgiften.

Anden grad:
er en fastlagt procent af den salgsværdi båden fanger den tur mellem 20 og 30 mio. kr.

Tredie grad:
er et fastlagt procent af den salgsværdi, båden fanger den tur mere end 30 mio. kr."

§ 3.

Pristilskuddet bliver i overenskomstperioden i henhold til §§ 1 og 2 at fordele på samme måde som pristilskuddet, drifts- og mandskabsstøtten blev fordelt før 1. januar 1992.

§ 4.

De forlængede overenskomster kan opsiges af begge parter med mindst 3 måneders frist til en 1. januar.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

§ 5.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Sáttmálarnir millum Reiðarafelagið og fiskivinnufeløgini fóru úr gildi 1. januar 1992.

Sáttmálar eru gjørdir millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag og Motorpassarafelagið og Føroya Reiðarafelag; men sáttmálaloysi er millum Reiðarafelagið og Skipara- og Navigatørfelagið og Reiðarafelagið og Maskinmeistarafelagið.

Verkfallið hevur staðið við í 3 vikur, og semingsstovnurin hevur boðað frá, at eingin samráðingarloysn enn er fingin, hóast tvey semingsuppskot eru løgd fyri partarnar.

Tí er bert í at velja, at Løgtingið leggur uppí, ella framhaldandi verkbann og verkfall til annar parturin av tíggjarligum trýsti liggur eftirá.

Tað seinna rakar stórar partar av samfelagnum og øðrum fakfeløgum, sum ikki kunnu meðvirka til at loysa trætuna, t.d. fiskaurbeiðið á flakavirkjunum, har virði fyri milliónir verða mist, umframt at framhaldandi ósemjur elva til enn størri arbeiðsloysi millum fólk.

Meginreglan sambært løgtingslóg nr. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til ráfisk er, at almenna ískoytið verður at býta partanna millum sambært avtalu. Fyri sáttmálaskeiðið sambært §§ 1 og 2 í hesum løgtingsmálinum, er avtala gjørd millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag og Motorpassarafelagið og Føroya Reiðarafelag um at býta á sama hátt sum áðrenn 1. januar 1992. Hetta býtið verður sum partur av semingini at galda allar partar sbr. § 3.

Landsstýrið heldur tað tí verða neyðugt, at leggja uppí ósemjuna nú, og hevur løgmaður tí heitt á løgtingsformannin um at kalla løgtingið saman innan ásetta dagin.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 74/1991: Loysn á sáttmálaósemju.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. januar 1992 og eftir 1. viðgerð 22. januar 1992 beint í arbeiðaranevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við partarnar í málinum.

Nevndin er samd um, at eingin av teimum í sáttmálastríðnum uvvarandi persónar skulu koma at merkja avleiðingar orsakað av støðu sínum í verkfallinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Sverre Midjord, Anfinn Kallsberg og Bjarni Djurholm) førir fram:

Havandi í huga ta hættisligu støðu alt samfelag okkara er í, ásannar nevndi meiriluti, at kreppan krevur eina loysn, og ta ábyrgdina mai løgtingið átaka sær, hóast best var, um partarnir sjálvir komu ásamt. Tá so ikki er, mælir nevndi meiriluti til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Viðvíkjandi tulkingini av § 1, stk. 2, og § 2, stk. 2, verður tilskilað:

Býtið verður soleiðis:

Fyri 6 menn:

Fiskipartur: 27% - frítíðarløn 3,24%	= 30,240%,
Yvirmenn: 4,5% x 2,25	= 10,125%,
Samanlagt:	40,365%,

(Partur pr. mann 27 : 6 = 4,5%.

Fyri 5 menn:

Fiskipartur: 27% - frítíðarløn 3,24%	= 30,240%,
Yvirmenn: 5,4% x 2,25	= 12,150%,
Samanlagt:	42,390%,

(Partur pr. mann 27 : 5 = 5,4%).

Við 5 monnum verður parturin lækkaður við 1% til 29,24% og hjá yvirmonnunum við 1% til 11,150% soleiðis at samlaða býruprosentið verður 40,4%.

Við 4 monnum verður sami framferðarháttur nýttur í útrokningini sum í oman fyristandandi dømi.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Hin minnilutin (Signar Hansen) vísir til tað, ið Tjóðveldisflokkurin førdi fram undir 1. viðgerð og setir einki uppskot fram.

ískoytisálit

í

Løgtingsmáli nr. 74/1991: Loysn á sáttmálaósemju.

Meirilutin í arbeiðaramálanevndin (Sverre Midjord, Anfinn Kallsberg og Bjarni Djurholm) setir fram fylgjandi ískoyti:

Býtið av yvirmonnunum í døminum í álitinum er:

Ein skipari, ein stýrimaður, ein maskinmeistari og ein kokkur.

Har fleiri yvirmenn eru, verða prosentpartarnir at hækka tilsvarandi.

75. Broyting í reglunum um prísískoyti til ráfisk

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting til løgtingslóg um prísískoyti til ráfisk.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til ráfisk, sum broytt við løgtingslóg nr. 115 frá 20. desember 1991, verður § 1, Stk. 3, orðað soleiðis:

"Prísískoytið verður at býta sambært avtalu partanna millum."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om pristilskud til råfisk.

§ 1.

I lagtingslov nr. 111 af 3. august 1990 om pristilskud til råfisk, som ændret ved lagtingslov nr. 115 af 20. december 1991, affattes § 1. stk. 3 således:

"Pristilskuddet bliver at fordele i henhold til aftale mellem parterne."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar

Í sambandi við at løgtingið í løgtingsmáli nr. 74/1991: Loysn av sáttmálaósenju, leggur upp í sáttmálatractuna millum yvirmannafeløgini og Reiðarafelagið, er neyðugt at broyta orðaljóðið í hesi lóg. § 1, stk. 3. Við hesum er samstundis betri samsvar millum viðmerkingar og lógartekst.

Lógin ásetir nú bert, at almenna tilskotið til fiskipartarnar verður býtt eftir avtalu partanna millum.

Í § 3, í uppskoti til løgtingslóg um leinging av ávísum lønarsáttmálum er avtalan fyri sáttmálaskeiðið í 1992 ásett.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 75/1991: Broyting í løgtingslóg um prísískoyti til ráfisk.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. januar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 28. januar 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og vísir á, at ásett er við lóg, at prísfskoyti verður býtt eftir sáttmála ella avtalu, ið øll vinnufeløgini gera áðrenn 1. januar 1992. Eingin avtala varð gjørd millum feløgini áðrenn 1. januar 1992, sum lógin áseti, men bert nakrir av pørtunum eftir 1. januar 1992 og seinni við løgtingslóg nr. 5 frá 23. januar 1992 um leingjan av ávísum lønarsáttmálum. Nevndin er samd um, at fyriliggjandi lógaruppskot eigur at fáa gildi frá 1. januar 1992, so ongar misskiljingar taka seg upp.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting. Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 2. verður soljóðandi:	§ 2. formuleres således:
"Henda lóg fær gildi 1. januar 1992."	"Denne lov træder i kraft 1. januar 1992."

76. Friðing av Norðhavinum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka til nýggja viðgerð friðingina av Norðhavinum við tí fyri eyga at friða øki B alt árið fyri trol, soleiðis at botngróður fær vaksið aftur.

Viðmerkingar

Vísandi til løgtinglóg nr. 8 frá 29. mars 1978 verður sett fram hetta uppskot til samtyktar.

Av tí at fiskastovnurin undir Føroyum er komin so lant niður sum ongantíð fyrr, er neyðugt at friða ein part av Norðahavinum alt árið fyri trol, soleiðis at vit fáa náttúrlig botnviðurskifti aftur har. Tað er ikki nóg mikið at friða í gýtingartíðini, sum gjørt hevur verið í fleiri ár.

Hetta er ikki ein spurningur um trol ella húkaveiði, men ein spurningur um vit skulu yvirlíva í Føroyum.

Sum støðan er í løtuni, man tað knípa hjá fleiri familjum at eiga fyri breyð, um vend ikki kemur í nakað skjótt, so verður bungursneyð í Føroyum. Her eru tað serliga tey øki í landinum, sum liva av líno og snelluveiðu, meðan tað kanska stendur heldur frægari til hjá teimum, sum hava trolara at fiska við, so leingi nakar upsi er eftir. tað man ikki fara at vera so leingi, nú trolarar eru lagstir á at fiska seið á Norðhavinum, meðan snellubátarnir mugu rýma aftur til lands. tí tað bert er seiður sum fæst. Hetta er eitt talandi dømi um, hvat tað er sum hendir á Føroyagrunnunum.

Tað skuldi verið av størsta áhuga hjá øllum hugsandi føroyingum, at farið væl um fiskastovnarnar. tí hetta er okkara einasta náttúrugivna tilverugrundarlag (lívsgrundarlag).

Tí farið eg at skjóta upp fyri løgtinginum at áleggja landsstýrinum saman við fiskivinnunevndini, at taka til nýggja viðgerð friðingina á Norðhavinum og friða øki B alt árið fyri trol úr landi og út av kantinum. Hetta er gamalt ynski hjá útróðrarmonnum norðanfjørðs, sum eisini skulu liva í Føroyum.

Tá skotið verður upp at friða B-økið frá Ennibergi og vestur á Mýsing, er tað tí, at hetta er friðað í gýtingartíðini frammanundan, so her skuldi ikki verið so nógv at mist hjá trolarunum, um nakar sum helst vilji er frá teirra síðu. Tað var sera óheppi, at hetta ikki kom fgjøgnum í seinastu viku, í fiskivinnunevndini.

Herafturat kemur, at kassi K, sum sker inn í B - økið, er friðaður frammanudan fyri trol alt árið.

Henda friðing má koma í gildi, áðrenn núgaldandi friðing fer úr gildi, um nøkur hjálp skal vera í hesum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 76/1991: Friðing av Norðhavinum.

Málið er lagt fram av Heina O. Heinesen, løgtingsmanni, tann 28. januar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 6. februar 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannesen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) vísir á § 4 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á land-leiðini, har ásett er at landsstýrinum eftir samráð við løgtingsins fiskivinnu-nevnd. er heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini. Landsstýrið hevur í ár saman við løgtingsins fiskivinnu-nevnd ásett friðingar á ávísum leiðum til tess at verja um fiskastovnarnar. Tá fiskivin-

nunevndin til eina og hvørja tíð kann taka spurnigin um friðingar upp til nýggja viðgerð, tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jógvan I. Olsen)

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen og Niels Pauli Danielsen) tekur ikki undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

77. Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

Uppskot

til

Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning.

Kapittul I
Limaskapur

§ 1.

Løntakarar, fiskimenn og útróðrarmenn, sum eru skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum, hava fylt 16 ár, men ikki fylt 67 ár og eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, hava skyldu til at tekna arbeiðsloysistrygging.

Stk. 2. Sjálvstøðug vinnurekandi hava rætt til at tekna arbeiðsloysistrygging sambært ásetingunum í hesi lóg.

Stk. 3. Tryggingin heldur uppat,

a) við endanum á tí mánaði viðkomandi fyllir 67 ár
b) tá hin tryggjaði gerst óarbeiðsfør-ur,
c) um tryggingargjaldið ikki er goldið.

Kapitel I
Medlemskab

§ 1.

Lønmodtagere, fiskere og hjemmefiskere, som er registreret i folkeregistret på Færøerne, har fyldt 16 år, men ikke fyldt 67 år, og står til rådighed for arbejdsmarkedet, har pligt til at tegne arbejdsløshedsforsikring.

Stk. 2. Selvstændige erhvervsdrivende har ret til at tegne arbejdsløshedsforsikring efter bestemmelserne i denne lov.

Stk. 3. Forsikringen ophører,

a) i slutningen af den måned vedkommende fylder 67 år,
b) når den forsikrede bliver uarbejdsdygtig.
c) hvis der ikke er betalt til forsikringen.

d) tá hin tryggjaði doyr.

Stk. 4. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir nærri reglur um undantak frá kravinum um at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum sambært stk. 1.

Kapittul II
Gjald til tryggingina.

§ 2.

Fæið hjá tryggingini verður fingið til vega við serligum gjaldi frá tryggingartakara og øllum arbeiðsgevarum í Føroyum.

§ 3.

Frá trygging er teknað, og til tryggingin heldur uppat, rindar tryggingartakarin 2% í tryggingargjaldi av útgoldnari A-inntøku fyri hvørja lønarútgjalding.

Stk. 2. Tryggingartakari, sum er sjálvstøðugt vinnurekandi, rindar árliga 2% av meðal B-inntøku síni fyri 3 tey seinastu árini.

Stk. 3. Tryggingartakari skal tó ongantíð gjalda meiri enn 2% av teirri upphædd, sum goldin verður í ársinntøku fyri 40 tíma arbeiðsviku sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag hækkað við 15%.

Stk. 4. Gjaldið sum nevnt er í hesi, kann krevjast inn við panting.

Stk. 5. Tryggingargjøld kunnu dragast frá í uppgerðini av tí skattskyldugu inntøkuni.

d) når den forsikrede afgår ved døden.

Stk. 4. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om undtagelse fra kravet om at stå til rådighed for arbejdsmarkedet i henhold til stk. 1.

Kapitel II
Betaling til forsikringen

§ 2.

Forsikringens midler tilvejebringes ved særlig indbetaling fra forsikringstagerne og samtlige arbejdsgivere på Færøerne.

§ 3.

Fra forsikring er tegnet og indtil forsikringen ophører, indbetaler forsikringstagerne 2% af udbetalt A-indtægt af hver lønudbetaling.

Stk. 2. Forsikringstagere, som er selvstændige erhvervsdrivende, indbetaler 2% årligt af sin gennemsnitlige B-indtægt for de sidste 3 år.

Stk. 3. Forsikringstagerne skal dog aldrig indbetale mere end 2% af det beløb, som bliver udbetalt i årsindtægt i henhold til den til enhver tid gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag for en 40 timers arbejdsuge forhøjet med 15%.

Stk. 4. Den i denne nævnte indbetaling, kann indkræves ved pantning.

Stk. 5. Forsikringsindbetalinger er fradragsberettigede ved opgørelse af den skattepligtige indkomst.

§ 4.

Allir arbeiðsgevarar í Føroyum rinda 2% av hvørji A-lønarútgjalding til Arbeiðsloysistryggingina.

Stk. 2. Tað í stk. 1 nevnda gjald kann krevjast inn við panting.

§ 5.

Landsstýrið kann einans eftir uppskoti frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina broyta tryggingargjaldsprosentið, sum tryggingartakarin skal gjalda sambært § 3 og gjaldið, sum arbeiðsgevarin skal gjalda sambært § 4.

Stk. 2. Tryggingargjøldini, sum ásett verða sambært stk. 1, skulu vera eins stór, sbr. tó § 3, stk. 3.

§ 6.

Landskassin letur 20 mió. kr. sum stovnsfæ til arbeiðsloysistryggingina sum eingangsgjald.

§ 7.

Landsstýrið kann eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini áseta nærri reglur um inngjøld til arbeiðsloysistryggingarskipanina.

Kapittul III

Útgjalding av arbeiðsloysistrygging.

§ 8.

Rætt til tryggingarútgjald fær persónur, tá hann hevur verið limur í Arbeiðsloysistryggingini í eitt ár.

Stk. 2. Útgjaldingin fyri teir í § 1, stk. 1 nevndu persónar byrjar tó 1. august 1992. Fram til tann dag, tá ið tryg-

§ 4.

Samtlige arbejdsgivere på Færøerne betaler 2% af hver lønudbetaling til arbejdsløshedsforsikringen.

Stk. 2. Den i stk. 1 nævnte indbetaling kan indkræves ved pantning.

§ 5.

Landsstyret kan kun efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen ændre indbetalingprocenten, som forsikringstagerne skal betale i henhold til § 3 og indbetalingen, som arbejdsgiveren skal betale i henhold til § 4.

Stk. 2. Forsikringsindbetalingerne, som er fastsat i henhold til stk. 1, skal være lige store, jfr. dog § 3, stk. 3.

§ 6.

Landskassen betaler 20 mio. kr. som startkapital til arbejdsløshedsforsikringen som éngangsbeløb.

§ 7.

Landsstyret kan efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte nærmere regler om indbetalinger til arbejdsløshedsforsikringen.

Kapitel III

Udbetaling af arbejdsløshedsforsikring.

§ 8.

Ret til udbetaling af arbejdsløshedsforsikring opnås efter medlemskab i arbejdsløshedsforsikringen i et år.

Stk. 2. Udbetalingen for de i § 1, stk. 1 nævnte personer begynder dog 1. august 1992. Indtil forsikringsordning-

gingarskipanin hevur verið í gildi í eitt ár, fáa persónar sambært § 1, stk. 2, tó rætt til tryggingarútgjald, tá ið teir hava verið limir í Arbeiðsloysistryggingini í 6 mánaðir.

Stk. 3. Tryggingartakari, sum fer úr arbeiði í skúla ella í læru, missir ikki vunna tímatíð. Sama regla er galdandi fyri tryggingartakara, sum fer í vinnu uttanlands. Frammanfyri nevnda áseting er bert galdandi, um so er, at arbeiðsloysistryggingin hevur fingið boð um hetta, áðrenn tryggingartakarin fer í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands.

en har været i kraft i et år, opnår personer i henhold til § 1, stk. 2, dog ret til forsikringsudbetaling, når de har været medlemmer i Arbejdsløshedsforsikringen i 6 måneder.

Stk. 3. Forsikringstagere, der overgår fra ansættelse til skolegang eller læreplads, mister ikke opnået medlemstid. Samme regel er gældende for forsikringstagere, der overgår til erhverv i udlandet. Ovennævnte bestemmelse er kun gældende i tilfælde af, at arbejdsløshedsforsikringen har fået oplysning herom, forinden forsikringstageren overgår til skolegang, læreplads eller erhverv i udlandet.

§ 9.

Útgjaldingarupphæddin er í mesta lagi 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

§ 9.

Udbetalingsbeløbet er højst 70% af det beløb, som bliver udbetalt i henhold til den til enhver tid gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag for 40 timers arbejdsuge iberegnet feriepenge.

§ 10.

Tryggingartakari, sum verður uppsagdur av egnum ávum, missir rætt til tryggingarútgjald í 4 vikur. Sama regla er galdandi, um so er, at tryggingartakari uttan haldgóða grund sigur seg úr starvi.

§ 10.

Forsikringstagere, der selv giver anledning til opsigelse, mister retten til forsikringsudbetaling i 4 uger. Den samme bestemmelse er gældende i tilfælde, hvor forsikringstager siger op uden grund.

§ 11.

Útgjaldingarupphæddin pr. dag hjá løntakarum verður grundað á 70% av A-inntøku teir seinastu 12 mánaðirnar áðrenn arbeiðsloysi hjá tí tryggjaða og verður staðfest sambært 12 býtt við 227 døgum.

§ 11.

Udbetalingsbeløbet pr. dag for forsikringstagere bliver beregnet som 70% af A-indkomsten de sidste 12 måneder inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12 delt med 227 dage.

Stk. 2. Hjá sjálvstøðugt vinnurekandi verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 70% av meðalskattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 227 døgum.

Stk. 3. Hjá persónum, sum bæði eru sjálvstøðugt vinnurekandi og løntakarar, verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðimar áðrenn arbeiðsloysi hjá tí tryggjaða og verður staðfest sambært § 12, býtt við 227 døgum, og 70% av meðal skattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 227 døgum. Útgjaldingarupphæddin sambært hesi áseting má saman við møguligari aðrari lønarinntøku/skattskyldugum avlopi av vinnuvirki tó ongantíð fara upp um 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tíð til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Stk. 4. Frá 1. august 1992 til 1. august 1993 kann tryggingartakari krevja, at útgjaldingarupphæddin pr. dag verður grundað á 70% av A- inntøkuni í einum samlaðum 12 mánaða skeiði seinastu 3 árini býtt við 227 døgum. Ivamál í samband við skiftisreglurnar í hesum stk. kunnu leggjast fyri stýrið fyri arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávfsingini til avgerðar.

Stk. 2. For selvstændige erhvervsdrivende bliver udbetalingsbeløbet pr. dag beregnet som 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden er ophørt, delt med 227 dage.

Stk. 3. For personer, der er selvstændige erhvervsdrivende og lønmodtagere bliver udbetalingsbeløbet pr. dag beregnet som 70% af A-indtægten de sidste 12 måneder siden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12, delt med 227 dage, og 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden er ophørt, delt med 227 dage. Det således fastsatte udbetalingsbeløb må tillige med øvrige lønindtægter/skattepligtigt overskud af erhvervsvirksomhed dog aldrig overstige 70% af det beløb, som bliver udbetalt for 40 timers arbejdsuge, medregnet ferieløn i henhold til den til enhver tid gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Stk. 4. Fra 1. august 1992 til 1. august 1993 kan forsikringstageren kræve, at udbetalingsbeløbet pr. dag bliver beregnet som 70% af indtægten i en samlet 12 måneders periode de sidste 3 år delt med 227 dage. Tvivlsspørgsmål i forbindelse med overgangsreglerne i dette stk. kan forelægges for bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen til afgørelse.

Stk. 5. Fyri tryggingartakarar, sum nevndir eru í § 8, stk. 3 verður útroknингargrundarlagið sambært stk. 1, 2 og 3 nýtt fyri tíðarskeiðið, áðrenn tryggingartakarin fór í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands.

§ 12.

Arbeiðsloysistrygging verður útgoldin, tá hin tryggjaði gerst arbeiðsleysur, og hann leggur fram váttan um hetta frá arbeiðsgevara sínum, og arbeiðsávísingin ikki kann ávísa arbeiði til viðkomandi.

Stk. 2. Upphæddin sambært § 11 verður roknað soleiðis:

1. Fyri tímalønt verður tryggingarútgjaldið roknað frá og við 2. arbeiðsloysisdegi.
2. Fyri løntakarar, sum eru fastløntir og onnur, verður tryggingarútgjaldið roknað frá og við 5. arbeiðsloysisdegi.
3. Fyri sjálvstøðugt vinnurekandi verður tryggingarútgjaldið roknað frá og við 5. degi, aftaná at persónliga arbeiðið í virkinum er hildið uppat.

Stk. 3. Fyri tryggingartakarar á fiskavirkjum verður tryggingarútgjaldið roknað eina ferð um vikuna frá og við 9. arbeiðsloysistíma. Fyri tryggingartakarar, sum hava avtalað ikki at arbeiða fulla tíð, verður tryggingarútgjaldið roknað við einum lutfalsligum lægri tímatali.

Stk. 4. Útgjaldingar sambært stk. 3 verða goldnar av arbeiðsgevaranum, sum síðani fær upphæddina endurgoldna frá arbeiðsloysistryggingini.

Stk. 5. For forsikringstagere, som er nævnt i § 8, stk. 3, skal beregningsgrundlaget i henhold til stk. 1, 2 og 3 benyttes for perioden inden forsikringstageren overgik til skolegang, læreplads eller erhverv i udlandet.

§ 12.

Arbejdsløshedsforsikring bliver udbetalt, når den forsikrede bliver ledig og fremlægger attest herpå fra sin arbejdsgiver og arbejdsanvisningen ikke kan anvise arbejde til den pågældende.

Stk. 2. Beløbet i henhold til § 11 bliver beregnet således:

1. For timelønnede bliver forsikringsudbetalingen beregnet fra og med 2. ledighedsdag.
2. For lønmodtagere som er fastlønnede og andre, bliver forsikringsudbetalingen regnet fra og med 5. ledighedsdag.
3. For selvstændige erhvervsdrivende bliver forsikringsudbetalingen regnet fra og med 5. dag, efter at det personlige arbejde på virksomheden er ophørt.

Stk. 3. For forsikringstagere på fiskevirksomheder bliver forsikringsudbetalingen regnet en gang om ugen fra og med 9. ledighedstime. For forsikringstagere, som efter aftale ikke arbejder fuld tid, bliver forsikringsudbetalingen regnet efter et forholdsmæssigt lavere timetal.

Stk. 4. Udbetalinger i henhold til stk. 3 udbetales af arbejdsgiveren, som derefter får beløbet tilbagebetalt fra arbejdsløshedsforsikringen.

Stk. 5. Tryggingartakari, sum er fiskimaður, verður at rokna sum arbeiðsleysur, tá eitt tíðarskeið er runnið svarandi til prosentpart av túralongdini seinasta túrin, ásettan av stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina.

Stk. 6. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini ásetir nærri reglur um, nær fiskimaður annars verður at rokna sum arbeiðsleysur.

Stk. 7. Útróðrarmenn, sum eiga útróðrarfar ella part í útróðrarfari, sum er undir eina ávísa støddd, ásetta av stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina, kunnu einans lata seg tryggja sum sjálvstøðugt vinnurekandi sambært § 11, stk. 2 og 3.

Stk. 8. Útróðrarmenn, sum eiga útróðrarfar ella part í útróðrarfari yvir eina ávísa støddd ásetta av stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina, verða tryggjaðir sum løntakarar.

Stk. 9. Útróðrarmenn annars verða tryggjaðir sum løntakarar.

Stk. 10. Tryggingarútgjaldið fyri útróðrarmenn verður roknað frá og við 5. degi, eftir at útróðrarmaður er sagdur úr starvi.

Stk. 11. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir nærri reglur um, nær útróðrarmaður annars verður at rokna sum arbeiðsleysur.

Stk. 12. Sjálvstøðugt vinnurekandi verða at rokna sum arbeiðsleys, tá per-

Stk. 5. Forsikringstagere, der er fiskere, regnes som ledige, når en periode svarende til en procentdel af den sidste turs længde er forløbet, fastsat af bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen.

Stk. 6. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om, hvornår fiskere iøvrigt skal regnes som ledige.

Stk. 7. Hjemmefiskere, som ejer hjemmefiskerfartøj eller andel i hjemmefiskerfartøj under en vis størrelse, fastsat af bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen, kan kun lade sig forsikre som selvstændigt erhvervsdrivende, i henhold til § 11, stk. 2 og 3.

Stk. 8. Hjemmefiskere, som ejer hjemmefiskerfartøjer eller andel i hjemmefiskerfartøj over en vis størrelse fastsat af bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen, forsikres som lønmodtagere.

Stk. 9. Hjemmefiskere iøvrigt skal forsikres som lønmodtagere.

Stk. 10. Forsikringsudbetaling til hjemmefiskere bliver regnet fra og med 5. dag, efter at hjemmefiskere er opsagt.

Stk. 11. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om, hvornår hjemmefiskere iøvrigt skal regnes som ledige.

Stk. 12. Selvstændige erhvervsdrivende regnes som ledige, når deres per-

sónliga arbeiðið teirra í virkinum er hildið uppat. Nærri reglur um, nær sjálvstøðugt vinnurekandi verða at rokna sum arbeiðsleys, verða ásettar av stýrinum.

Stk. 13. Útgjaldingar frá arbeiðsloysistryggingini til tryggingartakaran er skattskyldug inntøka.

Stk. 14. Landsstýrið ásetir í kunngerð eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina nærri reglur um arbeiðsloysistryggingarútgjald.

§ 13.

Rætturin til tryggingarútgjald fellur burtur, tá tryggingartakari í undanfarna 3 ára skeiði hevur fingið útgjald í 454 dagar, ella flytir av landinum.

Kapittul IV
Umsiting

§ 14.

Til at sita fyri og hava ábyrgdina av arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini verður eitt stýri valt. Hetta hevur 7 limir, sum verða valdir av landsstýrinum. 3 limir skulu umboða løntakarafeløgini og verða valdir eftir uppskoti frá løntakarafeløgunum:

Ein umboðandi løntakarafeløgini hjá tímaløntum, ein umboðandi løntakarafeløgini hjá fiski- og útróðrarmonnum og ein limur umboðandi løntakarafeløgini hjá starvsfólkum. 2 limir skulu umboða privatu arbeiðsgevar-

sonlige arbejde i deres virksomhed er ophørt. Nærmere regler om, hvornår selvstændige erhvervsdrivende regnes som ledige, fastsættes af bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen.

Stk. 13. Udbetaling fra arbejdsløshedsforsikringen til forsikringstagerne er skattepligtig indkomst.

Stk. 14. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen nærmere regler om arbejdsløshedsforsikringenudbetaling.

§ 13.

Retten til forsikringsudbetaling bortfalder, når den forsikrede i den foregående 3 års periode har modtaget udbetaling i 454 dage, eller flytter til udlandet.

Kapitel IV
Forvaltning

§ 14.

Til at forestå og at have ansvaret for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen vælges en bestyrelse. Den består af 7 medlemmer, valgte af landsstyret. 3 medlemmer repræsenterer lønmodtagerorganisationerne og vælges efter indstilling fra lønmodtagerorganisationerne:

En repræsenterer lønmodtagerorganisationerne for timelønnede, en repræsenterer lønmodtagerorganisationerne for fiskere og hjemmefiskere og et medlem repræsenterer lønmodtagerorganisationerne for funktionærer. 2 med-

arnar, og verða valdir eftir uppskoti frá arbeiðsgevarafeløgunum, meðan 1 limur skal umboða hitt almenna sum arbeiðsgevara. 7. limurin er formaður.

Stk. 2. Samstundis verða vald vara fólk, sum taka sæti í stýrinum, tá stýrislimi berst frá.

Stk. 3. Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn, tó so at stýrislimur verður sitandi til nýggjur limur er valdur.

Stk. 4. Stýrið ger sjálvt starvsskipan sína.

Stk. 5. Innan 1. desember skal stýrið gera fíggjarætlan fyri Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina at galda árið eftir.

Stk. 6. Roknskaparárið er álmanakkaárið.

Stk. 7. Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara.

Stk. 8. Landsstýrið ásetir nærri reglur um val av stýri.

§ 15.

Arbeiðsloysistryggingin og arbeiðsávísingin verða umsitin av eini avgreiðsluskrivstovu.

Stk. 2. Stýrið setur neyðugt tal av fólki og leiðara av avgreiðsluskrivstovuni.

Stk. 3. Útreiðslur av umsitingini av arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini verða fíggjað burtur av gjøldum, sum nevnd eru í §§ 2, 3 og 4.

Stk. 4. Til nýtslu í samband við útrokning av útgjaldingarupphæddum

lemmer skal repræsentere private arbejdsgivere, og vælges efter indstilling fra arbejdsgiverorganisationerne, medens et medlem skal repræsentere det offentlige som arbejdsgiver. Det 7. medlem er formand.

Stk. 2. Samtidig vælges stedfortræder, der indtræder i bestyrelsen ved et bestyrelsesmedlems forfald.

Stk. 3. Bestyrelsesmedlemmernes valgperiode er 4 år, dog således, at bestyrelsesmedlemmerne forbliver i bestyrelsen, til nye medlemmer er valgte.

Stk. 4. Bestyrelsen udarbejder selv sin forretningsorden.

Stk. 5. Inden 1. december udarbejder bestyrelsen et budget for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen gældende for det kommende år.

Stk. 6. Regnskabsåret er kalenderåret.

Stk. 7. Regnskabet skal revideres af statsautoriseret revisor.

Stk. 8. Landsstyret fastsætter nærmere regler om valg af bestyrelse.

§ 15.

Arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen administreres af et ekspeditionskontor.

Stk. 2. Bestyrelsen ansætter nødvendigt antal ansatte og leder af ekspeditionskontoret.

Stk. 3. Udgifter i forbindelse med administrationen af arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen finansieres af de udbetalinger, som er nævnt i §§ 2, 3 og 4.

Stk. 4. Til brug i forbindelse med beregning af udbetaling efter denne lov.

eftir hesi lóg kann avgreiðsluskrivstovan útvega sær upplýsingar um inntøku tryggingartakarans, ið hava týdning fyri arbeiðsloysistryggingarútgjald, frá líkningarvaldinum.

Kapittul V
Kærur

§ 16.

Avgerðir um tryggingarútgjald og mál um arbeiðsávísing kunnu innan 4 vikur kærast til kærunevndina hjá arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini. Avgerðir hjá kærunevndini eru endaligar.

Stk. 2. Kærunevndin hevur 3 limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formaður, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir av landsstýrinum fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi til nýggjur er valdur.

Stk. 3. Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá.

Kapittul VI
Arbeiðsávísing

§ 17.

Arbeiðsávísingin verður umsitin av avgreiðsluskrivstovuni samsvarandi § 15.

Stk. 2. Landsstýrið kann eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina áseta nærri reglur um at arbeiðsávísingin heilt ella lutvíst kann umsitast av lokalum løntakarafeløgum.

kan ekspeditionskontoret skaffe sig oplysninger fra skattevæsenet om forsikringstagerens indkomster af betydning for arbejdsløshedsforsikringsudbetaling.

Kapittel V
Anker

§ 16.

Beslutninger vedrørende forsikringsudbetaling og sager vedrørende arbejdsanvisning kan inden 4 uger ankes til ankenævnet for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen. Ankenævnets afgørelser er endelige.

Stk. 2. Ankenævnet består af 3 medlemmer, et medlem, der repræsenterer lønmodtagerne, et medlem, der repræsenterer arbejdsgiverne og en formand, der skal være jurist. Medlemmerne bliver valgt af landsstyret for 4 år ad gangen, dog således, at nævnsmedlemmerne forbliver i nævnet til nye medlemmer er valgte.

Stk. 3. Samtidig vælges stedfortrædere, der indtræder i ankenævnet ved et medlems forfald.

Kapitel VI
Arbejdsanvisning

§ 17.

Arbejdsanvisningen bliver administreret af ekspeditionskontoret i henhold til § 15.

Stk. 2. Landsstyret kan efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte nærmere regler om, at arbejdsanvisningen helt eller delvis kan admin-

Stk. 3. Allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður í samband við arbeiðsávísing.

Stk. 4. Ikki er loyvt at seta fakmørk fyri arbeiðsávísing burtursæð frá neyðugum førleika.

Stk. 5. Tryggingartakari, sum uttan serliga orsøk noktar at taka upp ávíst arbeiði, missir rætt til tryggingarútgjald í 4 vikur.

Stk. 6. Landsstýrið ásetir í kunngerð eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina nærri reglur um virkið hjá arbeiðsávísingini

Kapittul VII
Reglur annars

§ 18.

Hevur tryggingartakari givið arbeiðsloysistryggingini skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum kunnu hava týdning fyri tryggingarútgjald, kunnu upphæddir, sum av óréttum eru móttiknar, verða kravdar aftur goldnar frá tryggingartakaranum. Hevur arbeiðsgevari luttikið í misnýtsluni, skal hann gjalda arbeiðsloysistryggingini sonnu upphædd.

§ 19.

Um ikki strangari revsing er ásett sambært lóggávuni annars, verður hann revsaður við sekt, sum sambært hesi lóg gevur tryggingini skeivar ella misvísandi upplýsingar.

Stk. 2. Er lógarbrotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann

istreres af lokale lønmodtagerorganisationer.

Stk. 3. Hele Færøerne regnes i forbindelse med arbejdsanvisning som et arbejdsmarkedsområde.

Stk. 4. Det er ikke tilladt at oprette faggrænser for arbejdsanvisning bortset fra nødvendige kvalifikationer.

Stk. 5. Forsikringstager, der uden særlig grund nægter at påtage sig anvist arbejde, mister retten til forsikringsudbetaling i 4 uger.

Stk. 6. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen nærmere regler for arbejdsanvisningens virksomhed.

Kapitel VII
Andre regler

§ 18.

Har forsikringstager givet forsikringen forkerte oplysninger eller fortiet omstændigheder, der er af betydning for forsikringsudbetaling, kan beløb, som er modtaget med urette, kræves tilbagebetalt af forsikringstageren. Har arbejdsgiver deltaget i misbruget, skal det tilsvarende beløb betales til arbejdsløshedsforsikringen.

§ 19.

Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, som giver forsikringen forkerte oplysninger.

Stk. 2. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lig-

áleggjast felagnum sjálvum sektarábyrgd.

§ 20.

Henda lóg fær gildi 15. februar 1992.

Stk. 2. Reglurnar í §§ 8, 9, 10, 11, 12 og 13 fáa tó gildi 1. august 1992.

Stk. 3. Lógin verður at endurskoða eitt ár aftaná at reglurnar um útgjalding eru komnar í gildi.

nende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 20.

Denne lov træder i kraft 15. februar 1992.

Stk. 2. Bestemmelserne i §§ 8, 9, 10, 11, 12 og 13 træder dog først i kraft 1. august 1992.

Stk. 3. Denne lov skal revideres et år efter, at reglerne om udbetaling er trådt i kraft.

Viðmerkingar

Fyrstu ferð at spurningurin um arbeiðsloysistrygging av álvara er frammi í Føroyum, er í 1918, tá ið løgtingið mælti til at seta í gildi lóg um arbeiðsloysisstyrk til arbeiðsleysar fiskimenn.

Hóast hesa løgtingssamtykt varð lógin av ymiskum orsøkum ikki sett í gildi. Málið var frammi aftur í 1920, tá ið løgtingið enn einaferð samtykti at heita á stjórnina um at seta lógina í gildi við ávísum broytingum. Óvist av hvørjari grund varð henda lóg tó ongantíð sett í gildi í Føroyum.

Í 1922 kom uppskot á tingborð um lóg um arbeiðsávísing og arbeiðsloysistrygging. Lógin kom eftir uppskoti frá ríkisstjórnini. Endamálið við uppskotinum var at seta ta donsku lógina um arbeiðsávísing og arbeiðsloysistrygging frá 22. desember 1921 í gildi í Føroyum. Her var talan um eina skipan, ið skuldi verða fíggjað av arbeiðsgevarum, arbeiðsloysiskassum og við studningi frá statinum.

Málið varð útsett til 1923. Tá málið varð tikið upp aftur í 1923, mælti eitt samt løgting frá at seta lógina í gildi í Føroyum við tí grundgeving, at lógin ikki var hóskandi til føroysk viðurskifti.

Aftur í 1932 varð uppskot lagt fyri tingið um arbeiðsávísing og arbeiðsloysistrygging. Í hesum føri samtykti løgtingið at senda málið út til kommununar til hoyringar. Nógv tann størsti parturin av kommunum, ið svaraðu, mæltu frá at seta lógina í gildi. Løgtingið var enn sum áður ivasamt í hesum spurningi, og endin varð, at ein meiriluti samtykti at útseta málið.

Síðan hevur málið verið frammi av og á, men ongantíð vorðið veruleiki.

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu stendur, at nevnd við umboðum frá tí almenna og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum verður sett at kanna spurningin um eina arbeiðsloysistrygging.

12. mars 1991 samtykti landsstýrið at seta eina slíka nevnd. Dentur varð lagdur á, at limirnir hjá felløgunum á arbeiðsmarknaðinum vóru so umboðandi sum gjørligt.

Arbeiðssetningur nevndarinnar var at fylgja ordingini í samgonguskjalinum.

Seinni á summi í 1991 var setningurin víðkaður til at gera uppskot til eina arbeiðsloysistrygging og eina arbeiðsávísing. Fundirnir hava verið nógvir í tali umfram ein kanningarferð í Danmark.

Her vórðu arbeiðsloysistrupulleikarnir á Bornholm gjølla kannaðir, tí umfram at Bornholm hevur á leið sama íbúgvaratal, so er teirra vinnustrukturur líkur okkara.

Álitið við uppskoti til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing var handað landsstýrinum 18. desember 1991. Síðan var álitið sent feløgunum á arbeiðsmarknaðinum til ummælis. Inn komu viðmerkingar frá 28 feløgum, og landsstýrið hevur viðgjørt allar viðmerkingar, og broytingar eru síðani gjørdar í upprunauppskotinum.

Vit hava í Føroyum í dag ongar fullfíggjaðar hagtalsviðgerðir av arbeiðsloysinum. Teir upplýsingar sum eru, umfata tey, sum vegna arbeiðsloysi hava fingið veiting eftir grein 9 í forsorgarlógini, men sjálvsagt ikki tey sum av ymsum orsøkum ikki lúka treytirnar í lógini.

Tá ið Almannastovan í dag viðger eina umsókn um kontanthjálp vegna arbeiðsloysi, verður fyrst funnið fram til fíggjarliga tørvin hjá umsøkjaranum. Sum góðkendar útreiðslur kunnu nevnast húsaútreiðslur, útreiðslur til ljós og hita, telefonútreiðslur, sjúkrakassa limagjald o.a. Samlaða hjálparveitingin má ikki gerast størri enn tann upphædd, sum verður rindað persónum, sum fáa hægstu dagpeningaupphædd.

Hinvegin fær umsøkjarin einki, um hann eigur ávíst krónutal standandi á bók.

Hetta er í løtuni:

Støk	kr. 26.772,-
Hjún	kr. 42.444,-
Heimabúgvandi/Sambúgvandi	kr. 21.222,-

Inntøkur hjá hjúnarfelaga verða altíð mótroknaðar í samlaðu útroknaðu játtanini. Hesi viðurskifti geva mangan fólki ta fatan, at ein sum sparir og eigur nakað av innistandandi peningi, verður í almannaverkinum revsaður.

Veitingarnar frá almannaverkinum, sum eru skattafrían, kunnu gerast rættiliga høgar. Dømi eru um veitingar uppá kr. 10.000,- og kr. 11.000,-. Tó er meðaltalið uppá kr. 5.500,-.

Tá persónur hevur fingið útgjald frá arbeiðsloysistryggingini í 454 dagar í undanfarna 3 ára skeiði, missir hann rættin til tryggingarútgjald. Fær hann tá ikki

ávíst eitt arbeiði, kann hann sjálvsagt søkja um arbeiðsloysisstuðul eftir 9 í forsorgarlógini. Greitt er, at útgjaldingin frá arbeiðsloysistryggingini ikki kemur á hædd við hægstu veitingarnar eftir forsorgarlógini. Tískil hevur verið neyðugt at samtykt uppskot um, at lækka veitingar eftir 9 til fólkapensjónsgrundupphædd og evt. barnaviðbót. Um ikki, so vildu nógv fólk kent seg tryggari við stuðli frá almannaverkinum heldur enn frá arbeiðsloysistryggingini. Tá vildu tey neyvan sæð nakran fyrimun í eini arbeiðsloysistrygging, sum sambært landsstýrisins fatan skal vera tann primera.

Hesa útreiðslur eftir 9 í forsorgarlógini hava verið:

1984/85:	kr.	1.558.515,-
1986:	kr.	1.714.082,-
1987:	kr.	1.256.211,-
1988:	kr.	1.411.930,-
1989:	kr.	3.433.570,-
1990:	kr.	18.912.107,-
1991:	kr.	46.627.449,-.

Í desember 1991 fingu 1001 fólk pengar frá almannaverkinum vegna arbeiðsloysi, og samlaða talið av veitingum í 1991 var 8.827.

Hóast hesir upplýsingar eru nakað skerdir, so geva teir eina týðuliga ábending um, hvussu arbeiðsloysið byrjar í 1989, men rættiliga tekur dik á seg í 1990, og veksur til eina skelkandi upphædd í 1991.

Arbeiðsbólkurin fór sum eitt tað fyrsta undir at gera eina kanning av arbeiðsloysinum.

Henda kanning er gjørd so neyvt, sum tað letur seg gera, og vísir hon, at gott 1400 persónar eru arbeiðsleysir, og svarar hetta til gott 6%.

Havandi hagtøl frá almannaverkinum og útrokningarnar hjá arbeiðsbólkinum í huga, so er málið um eina tryggingarskipan fyri tey arbeiðsleysu ongantíð meira átrokandi enn júst nú. Harmast kann um, at skipanin ikki varð sett á stovn, tá ið einki arbeiðsloysi var í landinum.

Tá ið tað eru "partarnir á arbeiðsmarknaðinum", sum hava gjørt uppskotið, so er í veruleikanum talan um eina semju, sum gjørd er. Í hesum sambandi er vert at nevna, at FA og FAG hava undirskrivað semju um at framleingja verandi sáttmála eitt ár fram til 1. mei 1993. Hetta er treytað av, at uppskotið verður samtykt í stórt sæð hesum líki.

Skotið verður upp, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum koma at fáa fulla umsitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av skipanini. Hetta merkir, at skipanin fíggjarliga skal hvíla í sær sjálvari, soleiðis at gjøldini verða sett eftir fíggjartørvinum. Tó um farast skal upp um 2%, krevst lógarbroyting, meðan ein lækking kann gerast

við eini kunngerð. Landskassans leiklutur verður sostatt umframt 20 mió. kr. gjaldið bert at gjalda sum arbeiðsgevari. Í frágreiðingini frá búskaparráðnum í januar 1992 sigur ráðið, at tað er sera umráðandi, at fast verður hildið við, at arbeiðsloysisstuðulin verður fíggjaður av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Landið eigur bert at luttaka í tann mun, landið sjálvt er arbeiðsgevari.

Hetta sigur ráðið, er ein neyðug treyt fyri, at lønirnar eins og prísirnir kunnu laga seg til viðurskiftini á marknaðinum. Somuleiðis sigur búskaparráðið, at arbeiðsloysistryggingin kemur at ávirka búskapin positiva vegin, tí tað gerst møguligt at sanera vinnulívið, tí at arbeiðsfólk hava nakað at liva av, og kann hetta samskipast við møguleikum fyri útbúgving/endurútbúgving av teimum ar-beiðsleysu til aðra vinnu.

Á uppskotinum til eykafíggjarløgtingslóg 1991 eru settar 20 mió. kr. av sum eitt eingangsgjald til stovnfæið.

Allir arbeiðsgevarar í Føroyum, t.v.s. bæði almennir og privatir skulu gjalda eitt ávíst prosent av útgoldnum A-inntøkum. Allir løntakarar í Føroyum, t.v.s. bæði í almennum og privatum arbeiði skulu gjalda eitt ávíst prosent av móttiknu A-inntøkuni. Skotið er upp, at gjaldið fyri tryggingartakarun ongantíð kann verða hægri enn 2% av ársinntøku fyri 40 tíma arbeiðsviku sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum FA og FAG hækkað við 15%, svarandi til kr. 3.549,- í dag.

Tað verður sostatt talan um eina tvungna skipan, har allir arbeiðsgevarar og allir løntakarar eru við til at fíggja skipanina. Hetta verður m.a. gjørt, tí arbeiðsloysi er ein samfelagsskaptur trupulleiki. Hetta verður eisini gjørt fyri at útvega skipanini neyðugu fíggingina.

Mett verður, at skipanin fær umleið 60 mió. kr. frá løntakarum og umleið 80 mió. kr. frá arbeiðsgevarum, ella falt 140 mió. kr. Gjaldføristørvurin við umleið 1400 arbeiðsleysum er mettur til 125 mió. kr.

Tryggingargjaldið hjá einum tímaløntum við 40 tíma arbeiðsviku er kr. 3.085,- um árið ella kr. 13,59 pr. arbeiðsdag (227 dg.), meðan tað hjá fólki við hægri inntøkum í mesta lagi er kr. 3.549,- árliga ella kr. 15,63 pr. arbeiðsdag (227 dg.).

Sjálvstøðugt vinnurekandi hava ikki somu skyldu, og skulu tey tí sjálvi taka stig til at tekna seg sum lim í arbeiðsloysistryggingini.

Tryggingartakari, sum er sjálvstøðugt vinnurekandi, rindar árliga 2% av meðal B-inntøku síni seinastu 3 árini.

Størsta útgjaldingarupphædd, ið fáast kann frá arbeiðsloysistryggingini er kr. 475,80 pr. dag, fyri fulla arbeiðsviku kr. 2.379,- ella kr. 108.000,- um árið.

Sum arbeiðsgevari hevur landsstýrið í fíggjarløgtingslógini fyri 1992 sett 14 mió. kr.

Mælt verður til, at Føroyar verður ein arbeiðsmarknaður. Hetta merkir, at tryggingartakari kann verða noyddur at átaka sær arbeiði í aðrari bygd ella aðrari oyggj. Tó verður tað álagt ávísingini altíð at royna at ávísa arbeiði so nær bústaði sum gjørligt, umframt at undantøk verða givin familjum við børnum í og undir skúlaaldri.

Hugsa vit um 50'árini, tá ið føroyingar í hópatali fluttu til eitt nú Íslands at arbeiða, so er føroyingurin ikki so staðbundin, tá talan er um vinnuloysi.

Eisini verður skotið upp, at eingi fakmørk verða, burtursæð frá neyðugum førleikum. Hetta forðar fyri, at tað kann vera arbeiðsloysi í einari vinnugrein, samstundis sum arbeiðsmegi vantar í aðrari.

Allir lønnmóttakarar, sum eru skrásettir í Føroyum, og hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, hava skyldu til at tekna seg til arbeiðsloysistryggingina.

Tryggingarútgjaldið, sum sjálvsagt altíð skal vera í samsvar við fíggjarligu orkuna í skipanini, verður mælt til at vera 70% av eini arbeiðaralón. Hetta verður somuleiðis loftið fyri útgjaldingini. Hinvegin verður inntøkan seinastu 12 mánaðirnar brúkt sum útrokningargrundarlag.

Ásannandi stóru trupulleikarnir vit í dag hava við teimum mongu arbeiðsleysu, hevur verið neyðugt at mæla til ávísar skiftisreglur, sum skulu gera tað lagaligari og smidligari at koma inn í skipanina.

Tað hava í nevndini verið nógvir trupulleikar av at gera hugtakslýsing av arbeiðsloysi. Hetta hevur serliga gjørt seg galdandi fyri fiskimenn og útróðrarmenn. Tí greinar lógaruppskotið ikki so gjølla teirra viðurskifti og tilknýti til skipanina, men verður mælt til, at stýrið saman við avvarðandi yrkisfeløgum ger nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Danska lógin ber eisini í hesum viðurskiftum eisini meira brá av at vera ein rammulóg.

Viðvíkjandi okkara fiskatilvirkingarvirkjum er gjørd ein serskipan. Hesi arbeiðsfólk verða javnan send heim vegna tørvandi rávøru. Tí verður mælt til, at trygginarútgjaldið verður roknað frá 9. tíma, frá tí at ein persónur hevur verið heimsendur. Gjørt verður upp hvørja viku. Hetta svarar til 1 karensdag um vikuna ella 4 um mánuðin.

Viðvíkjandi teimum skattligu viðurskiftunum verður skotið upp, at tryggingarútgjaldið verður skattskyldugt, meðan inngjaldið kann dragast frá í skattaskyldugu inntøkuni.

Hetta merkir, at eitt inngjald uppá 2% fer at merkjast sum 1% hjá tí tryggjaða.

Til tess at lætta um hjá fólki at finna arbeiði til tess at staðfesta at ein persónur er arbeiðsleysur, verður skotið upp, at sett verður á stovn ein arbeiðsávísing sam-

an við arbeiðsloysistryggingini. Talan verður um eina sentrala ávísing, meðan lokalu feløgini skulu taka sær av tí primeru ávísingini.

Nevndin hevur mett tað vera umráðandi, at vit í Føroyum ikki gera somu mistøk, sum eru gjørd aðrastaðni. Landsstýrið tekur undir við hesum sjónarmiðum.

Tað er landsstýrisins meting, at henda skipan:
- er í samsvar við altjóða krøv til arbeiðsloysistrygging.
- veitir teimum borgarum, ið gerast arbeiðsleysir, eftir umstøðumum bestu møguligu trygging uttan tó samstundis at virka sum ein minstulønarskipan.
- verður løtt hjá borgarunum at skilja og løtt at umsita, og
- verður soleiðis, at tað altíð betri loysir seg at arbeiða, um nakað arbeiði er at fáa, heldur enn at ganga arbeiðsleysur.

Víst verður annars til tær serligu viðmerkingar til hvørja einstaka grein sær, og viðmerkingar frá løntakarafeløgum, arbeiðsgevarafeløgum og Almannastovuni, ið eru viðløgd sum skjøl.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1, stk. 1:
Sambært hesum stk. verður skotið upp, at allir løntakarar, fiskimenn og útróðrarmenn í Føroyum hava skyldu til at vera limir í arbeiðsloysistryggingini.

Teir persónar sum koma undir tryggingarskyldu skulu vera skrásettir í Fólkayvirlitinum í Føroyum, harav fyltir 16 ár, men ikki 67 ár, og vera tøkir á arbeiðsmarknaðinum.

Fólk, sum áður ikki hava havt tilknýti til arbeiðsmarknaðin, sum t.d. skúlaungdómur og heimaarbeiðandi fólk, verða roknaði sum løntakarar, tá ið tey gjøgnum arbeiðsávísingina boða frá, at tey eru tøk á arbeiðsmarknaðinum.

Til § 1, stk. 2:
Meðan løntakarar, fiskimenn og útróðrarmenn hava skyldu til at lata seg tryggja, er skipanin sjálvboðin fyri sjálvstøðugt vinnurekandi, herundir útróðrarmenn sum eru umfatað av 12, stk. 7.

Til § 1, stk. 4:
Í hesum stk. verður skotið upp, at stýrið ger nærri reglur um undantak frá kravinum um at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum, tá ið talan er um kravda tímatalið í 1 ár sbrt. 1. Hugsað verður t.d. um fólk, sum eru sjúk og í barnsburðarfarloyvi. Henda tíð telur sostatt við í kravdu limatíðina.

Til § 2:
Í hesi grein verður skotið upp, at allir arbeiðsgevarar í Føroyum, bæði almennir og privatir, skulu rinda serligt gjald til arbeiðsloysistryggingina.

Til § 3, stk. 1:
Tryggingargjaldið, sum tryggingartakarin skal lata, verður roknað av hvørjari A-lønarútgjalding. Tryggingargjaldið hjá einum arbeiðara við 40 tíma arbeiðsviku er í løtuni roknað til kr. 3.085,- árliga.

Til § 3, stk. 2:
Møguleiki er hjá sjálvstøðugt vinnurekandi at lata seg tryggja. Hesi skulu lata 2% árliga í tryggingargjaldi av meðal B-inntøku síni fyri 3 tey seinastu árini.

Til § 3, stk. 3:
Skotið verður upp, at tryggingartakarin ongantíð skal gjalda meir enn 2% av teiri upphædd, sum goldin verður í ársinntøku fyri 40 tíma arbeiðsviku sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag hækkað við 15%. Frammanfyri nevnda hámark er í løtuni roknað til kr. 3.549,- árliga.

Til § 3, stk. 5:
Meðan tryggingarútgjaldingarnar eru skattskyldugar, verður skotið upp, at inngjøld til arbeiðsloysistryggingina kunnu dragast frá í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni.

Til § 4, stk. 1:
Frá tí degi lógin er komin í gildi, skulu allir arbeiðsgevarar í Føroynum rinda serligt gjald til tryggingina, sum í løtuni er 2% av hvørjari lønarútgjalding froknað frítíðarløn.

Til § 5, stk. 1 og 2:
Av tí at arbeiðsloysistryggingarskipanin skal umsitast av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, verður skotið upp, at landsstýrið einans kann broyta gjøldini saumbært §§ 3 og 4 eftir áheitan frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og ávísingina. Prosentsatsirnir í §§ 3 og 4 kunnu einans broytast innanfyri 2%.

Gjøldini frá arbeiðsgevara og tryggingartakara skulu vera eins stór, samanber tó inngjaldingarloftið í § 3, stk. 3. Skulu gjøldini hækkast upp um 2% frá tryggingartakara og arbeiðsgevara, er neyðugt við lógarbroyting.

Til § 6:
Til tess at stuðla arbeiðsloysistryggingini hevur landsstýrið, í uppskotinum til eykafíggjarlóg fyri 1991, skotið upp at játta arbeiðsloysistryggingini eina eingangsjáttan uppá 20 mió. kr. til arbeiðsloysistryggingina sum stovnsfæ.

Til § 7:
Av tí at stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávisingina hevur ábyrgdina og umsitingina av skipanini, verður skotið upp, at stýrið skal geva landsstýrinum tilmæli um reglur um inngjalding til tryggingina.

Til § 8, stk. 1 og 2:
Ein av treytunum fyri at fáa tryggingarútgjald er, at tryggingartakarin hevur verið limur í arbeiðsloysistryggingini í 1 ár. Sum eina yvirgangsskipan verður skotið upp, fram til eitt ár eftir at tryggingarskipanin hevur verið í gildi, krevst bert limaskapur í 6 mánaðir fyri at fáa rætt til tryggingarútgjald.

Til § 8, stk. 3:
Í hesum petti verður skotið upp, at tryggingartakarin varðveitir vunnu limatíð sína sambært § 8, stk. 1 um so er, at hann fer í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands. Áðrenn farið verður í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands, skal tryggingin hava boð um hetta.

Til § 9:
Skotið verður upp at hava eitt lok fyri tryggingarútgjaldingum uppá 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku hjá einum arbeiðara í Føroyum.

Til § 10:
Sambært hesi grein verður skotið upp, at tryggingartakari missir rættin til tryggingargjald í 4 vikur, tá hann verður sagdur úr starvi av egnum ávum ella uttan haldgóða grund sigur seg sjálvan úr starvi. Tær 4 vikurnar verða roknaðar frá tí degi, arbeiðsviðurskiftið er hildið uppat.

Til § 11, stk. 1:
Í hesi áseting verður skotið upp, at útgjaldingarupphæddin hjá tryggingartakarunum pr. dag verður 70% av vunnari A-inntøku seinastu 12 mánaðirnar býtt við 227 døgum. Eftir galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag kunnu sostatt í mesta lagi útgjaldast kr. 476, pr. dag við 5 daga viku. Frítíðarpeningur fyri undanfarna 12 mánaða skeiðið skal somuleiðis teljast við í útrokningargrundarlagið. Teir 227 dagarnir, sum nevndir eru í ásetingini, eru grundaðir á meðallalið av arbeiðsdøgum í eitt ár. Tá eru frítíð og halgidagar drignir frá.

Til § 11, stk. 2:
Munurin á hesi áseting og frammanfyri nevndu er, at útgjaldingarupphæddin verður grundað á meðalskattskyldugu inntøkuna seinastu 3 árini, áðrenn persónliga virksemið hjá tryggingartakaranum er hildið uppat.

Til § 11, stk. 3:
Í hesum stk. verður skotið upp, at fólk umframt tá tvingnu tryggingina sambært § 1, eisini kunnu tryggja seg sum sjálvstøðugt vinnurekandi (kombinatiónstrygging). Útgjaldingarupphæddin kann tó hægst ásetast til eina upphædd, ið er løgd

saman við vunnari løn/skattskyldugum avlopi av virki verður ájøvn við 70% av eini arbeiðaraløn.

Til § 11, stk. 4 og 5:
Her verður sum skiftisregla skotið upp, at tryggingartakari kann velja at útgjaldingaruppheddin verður grundað á 70% av A- inntøkuni í einum samlaðum 12 mánaða skeiði seinastu 3 árini býtt við 227 døgum. Reglan er galdandi í 1 ár frá tí tíðarskeiði útgjaldingin byrjar.

Til § 12, stk. 1:
Til tess at fáa arbeiðsloysistrygging útgoldna krevst váttan frá arbeiðsgevara um, at tryggingartakarin er sagdur úr starvi og váttan frá arbeiðsávísingini um, at hon einki skikkað starv hevur at ávísa. Ein avgerandi treyt fyri at fáa arbeiðsloysistrygging útgoldna er, at tryggingartakarin er tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

Ein tryggingartakari er ikki tøkur, um hann t.d.

- er sjúkur,
- er í barnsburðarfarloyvi,
- er raktur av verkfalli ella verkbanni,
- er í varðhaldi,
- er undir útbúgving,
- noktar at taka ímóti arbeiði, ið ávísingin vísir honum á, uttan haldgóða grund heldur uppat við arbeiði sínum ella verður uppsagdur av grundum, ið kunnu roknast honum sjálvum.

Til § 12, stk. 2:
Í hesi áseting verður skotið upp, at tryggingarútgjaldið fyri tímalønt verður roknað frá og við 2. arbeiðsloysisdegi, meðan tað fyri fastlønt og onnur verður roknað frá 5. arbeiðsloysisdegi.

Til § 12, stk. 3 og 4:
Skotið verður upp at hava eina serskipan fyri fólk á fiskavirkjum. Tryggingartakari, sum arbeiðir á fiskavirki, verður at rokna sum arbeiðsleysur frá og við 9. arbeiðsloysistíma. Fyri tryggingartakara, sum sambært avtalu ikki arbeiðir fulla tíð, verður roknað við einum lutfalsliga lægri tímatali. Tryggingarútgjaldið, sum verður roknað einaferð um vikuna, verður útgoldið av arbeiðsgevaranum, sum síðani fær útgoldnu upphæddina endurgoldna frá arbeiðsloysistryggingini.

Til § 12, stk. 5 og 6:
Hesi bæði stk. umrøða fiskimenn sum tryggingartakaran. Vegna serligu starvsviðurskifti hjá fiskimonnum verður skotið upp, at stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ger nærri reglur um, nær ein fiskimaður verður at

rokna sum arbeiðsleysur, og hvat tíðarskeið skal til, áðrenn hann fær tryggingarútgjald. Mett verður, at stýrið tekur upp samráðingar við avvarðandi felløg, tá nærri reglur verða gjørdar fyri fiskimenn.

Til § 12, stk. 7, 8, 9, 10 og 11:
Líkt og hjá fiskimonnum gera serlig starvsviðurskifti hjá útróðrarmonnum seg galdandi, tá talan er um arbeiðsloysistrygging. Eftir uppskotinum verður skilt millum, um talan er um eigara av útróðrarfari, útróðrarmann annars og stødd á útróðrarfari.

Er talan um útróðrarmenn, sum eiga útróðrarfar ella part í útróðrarfari undir eina ávísa stødd, ásetta av stýrinum, kunnu hesir einans lata seg tryggja sum sjálvstøðugt vinnurekandi.

Hinvegin skulu útróðrarmenn, sum eiga útróðrarfar ella part í útróðrarfari yvir eina ávísa stødd, ásetta av stýrinum, einans tryggja seg sum løntakara.

Útróðrarmenn annars skulu lata seg tryggja sum løntakarar. Skotið verður upp, at tryggingarútgjaldið fyri útróðrarmenn verður roknað frá 5. degi, eftir at útróðrarmaður er sagdur úr starvi. Annars er tað stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina, sum ásetir nærri reglur um, nær útróðrarmaður annars verður at rokna sum arbeiðsleysur. Mett verður, at stýrið í sambandi við ásetan av nærri reglum um hesi viðurskifti tekur upp samráðingar við Meginfelag Útróðrarmanna.

Til § 12, stk. 12:
Ein sjálvstøðugt vinnurekandi verður roknaður at vera arbeiðsleysur, tá hann skjalprógvar, at virksemi hansara er hildið uppat. Sum dømi kunnu nevnast skjalprógv, ið vísa konkurs, likvidatión, gjaldssteðg og tvangsakkord, men eisini onnur prógv kunnu góðtakast, sum t.d. prógv, ið vísa, at vinnutólini eru seld, ella vinnuloyvið er tikið aftur. Skotið verður upp, at stýrið ásetur nærri reglur um, nær sjálvstøðugt vinnurekandi verða at rokna sum arbeiðsleys.

Til § 12, stk. 13:
Meðan inngjaldingarnar til arbeiðsloysistryggingina kunnu dragast frá skattskyldugu inntøkuni, verður skotið upp, at tryggingarútgjald verður skattskyldugt sum vanlig A-inntøka.

Til § 12, stk. 14:
Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 7.

Til § 13:
Í hesi áseting verður skotið upp at rætturin til tryggingarútgjald fellur burtur, tá tryggingartakari í undanfarna 36 mánaða skeiði hevur fingið tryggingarútgjald í 454 arbeiðsdagar ella flytir av landinum.

Til § 14:
Í hesi grein verður skotið upp, at arbeiðsloysistryggingin og arbeiðsávísingin skulu hava felags stýri at fyrisita skipanina um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. Stýrið skal hava 7 limir valdar av landsstýrinum. 3 limir skulu umboða løntakarafeløgini, 2 limir privatu arbeiðsgevararnar meðan 1 limur skal umboða hitt almenna sum arbeiðsgevara. 7. limurin er formaður.

Til § 15:
Til tess at hava umsitingina av skipanini so bíliga og effektiva sum gjørligt, verður skotið upp, at arbeiðsloysistryggingin og arbeiðsávísingin hava felags skrivstovu.

Til § 16:
Kærur um tryggingarútgjald og mál um arbeiðsávísing sambært 17, stk. 5 kunnu innan 4 vikur kærast til kærunevndina fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina. Avgerðirnar hjá kærunevndini eru endaligar.

Til § 17, stk. 1 og 2:
Arbeiðsávísingin, sum verður umsitin av avgreiðsluskrivstovuni sambært 14 er ein sentral ávísing. Landsstýrið kann eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina áseta nærri reglur um, at arbeiðsávísingin heilt ella lutvíst kann leggjast út til løntakarafeløgini kring landið, soleiðis at hesi koma at taka sær av teirri primeru ávísingini.

Til § 17, stk. 3:
Skotið verður upp, at allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður soleiðis at skilja, at um einki arbeiði er til hjá arbeiðsleysa á staðnum, har hann býr, kann arbeiði ávísast viðkomandi aðrastaðni í landinum, har arbeiði er at fáa. Tó skal arbeiði altíð ávísast so nær bústaðnum hjá viðkomandi sum gjørligt. Í serligum førum kunnu tó undantøk gerast, sum t.d. vánaligir ferðamøguleikar til og frá arbeiði og bústaðarviðurskifti. Somuleiðis eiga eisini undantøk at verða gjørd fyri familjur við børnum í og undir skúlualdri og einlig við børnum.

Til § 17, stk. 4:
Sambært hesum petti er ikki loyvt at seta fakmørk í sambandi við arbeiðsávísing hurtursæð frá neyðugum førleika. Førleiki er at skilja bæði likamliga og yrkisliga. Endamálið við hesi áseting er at skipa so fyri, at arbeiðsleys fólk í eini vinugrein kunnu søkja arbeiði í vinnugrein, har tørvur er á arbeiðsmegi.

Til § 17, stk. 5:
Sambært hesi grein missir tryggingartakari, sum uttan serliga orsøk noktar at taka upp ávíst arbeiði rætt til tryggingarútgjald í 4 vikur. Sambært 16, stk. 1 er

møguleiki at kæra avgerðina hjá arbeiðsloysistryggingini um, at hin tryggjaði skal missa tryggingargjaldið í 4 vikur. Víst verður annars til viðmerkingarnar undir § 17, stk. 3.

Til § 17, stk. 6:
Her verður skotið upp, at landsstýrið í kunngerð eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir nærri reglur um virkið hjá arbeiðsávísingini. Her verður eisini hugsað um undantøkini, sum nevnd eru í viðmerkingunum til § 17, stk. 3.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 77/1991: Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. januar 1992 og undir 1. viðgerð 4. februar 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur lagt seg eftir at fáa til vega so haldgott grundarlag sum gjørligt fyri eini sakligari støðutøku. Arbeiðaramálanevndin hevur hildið fundir við umboð fyri øll yrkisfeløg, sum ikki beinleiðis hava verið umboðaðir í teirri nevndini, sum fyri landsstýrið greiddi úr hondum uppskot til lóg um arbeiðsloysistrygging í Føroyum. Umframt nevndu yrkisfeløg hava umboð fyri Tryggingarsambandið eisini verið á fundi við nevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Sverre Midjord, Anfinn Kallsberg og Bjarni Djurholm) hevur viðgjørt tey ymisku sjónarmiðini, sum eru komin fram undir nevndararbeiðinum, og fer at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landstýrisins til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing við hesum broytingum.

Viðmerkingar til broytingarnar

Ad § 1:
Av tí at skattaskipanin m.a. skal nýtast í samband við útgjalding av arbeiðsloysistrygging, er neyðugt við hesi broyting.

Ad § 8:
Tá skipanin er tvungin fyri løntakarar, fiskimenn og útróðrarmenn, verður tað mett at vera sera óheppið við eini kravdari limatíð upp á eitt ár, áðrenn trygging kann verða útgoldin.

Ad nýggj § 13:

Hetta uppskot ger tað møguligt hjá arbeiðsleysum at taka sær arbeiði fyri styttri tíðarskeið, uttan at arbeiðsloysisdagarnir skulu telja við í útrokningini av tryggingarútgjaldinum.

Samsvarandi hesum viðmerkingum setir meirilutin (Sverre Midjord, Anfinn Kallsberg og Bjarni Djurholm) fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) *§ 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:*
"Løntakarar, fiskimenn og útróðrarmenn, sum hava bústað í Føroyum, og sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, hava fylt 16 ár, men ikki fylt 67 ár og eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, hava skyldu til at tekna arbeiðsloysistrygging.

2) § 8 verður orðað soleiðis:
"Tryggingartakari, sum er fevndur av § 1, stk. 1, fær rætt til tryggingarútgjald, tá hann er vorðin limur í arbeiðsloysistryggingini.

Stk. 2. Rætt til tryggingarútgjald fær persónur, sum er sjálvstøðugt vinnurekandi, tá hann hevur verið limur í Arbeiðsloysistryggingini í eitt ár.

Stk. 3. Útgjaldingin fyri teir í § 1, stk. 1 og 2 nevndu persónar byrjar tó 1. august 1992. Fram til tann dag, tá ið tryggingarskipanin hevur verið í gildi í eitt ár, fáa persónar sambært § 1, stk. 2, tó rætt til tryggignarútgjald, tá ið teir hava verið limir í Arbeiðsloysistryggingini í 6 mánaðir.

1) *§ 1, stk. 1 affattes således:*
"Lønmodtagere, fiskere og hjemmefiskere, som bor på Færøerne, og er under fuld skattepligt på Færøerne, har fyldt 16 år, og er disponible på arbejdmarkedet, har pligt til at tegne arbejdsforsikring.

2) § 8 affattes således:
"Forsikringstageren, som er omfattet af § 1, stk. 1, får ret til forsikringsudbetaling, når han er blevet medlem i arbejdsløshedsforsikringen.

Stk. 2. Ret til forsikringsudbetaling får en person, som er selvstændigt erhvervende, når han har været medlem i Arbejdsløshedsforsikringen i et år.

Stk. 3. Udbetalingen for de i § 1, stk. 1 og 2 nævnte personer begynder dog 1. august 1992. Før den dag, når forsikringsordningen har været i kraft i et år, får personer i henhold til § 1, stk. 2, dog ret til forsikringsudbetaling, når de har været medlemmer i Arbejdsløshedsforsikringen i 6 måneder.

Stk. 4. Tá tryggingartakari, sum er sjálvstøðugt vinnurekandi, fer úr arbeiði, í skúla ella í læru, missir hann ikki vunna limatíð. Sama regla er galdandi, tá tryggingartakari, sum er sjálvstøðugt vinnurekandi, fer í vinnu uttanlands. Frammanfyri nevnda áseting er bert galdandi, um so er, at arbeiðsloysistryggingin hevur fingið boð um hetta, áðrenn tryggingartakarin fer í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands."

3) Sum nýggj § 13 verður sett:

"Verður arbeiði til tryggingartakaran ávíst av arbeiðsávísingini, sum varir í mesta lagi eina viku, verða bíðidagarnir í § 12 ikki taldir við í útrokningina av tryggingarútgjaldi."

4) Í § 20 verður sum nýtt skt. 3 sett:

"Landsstýrið ásetir í kunngerð, nær innkrevjingarnar samhært reglunum í hesi lóg skulu byrja."

5) §§ 13-20 verða eftir hesum §§ 14-21.

Stk. 4. Når forsikringstager, som er selvstændig erhvervende, holder op med at arbejde og begynder skole eller lære, taber han ikke forbundet medlemstid. Det samme er gældende, når forsikringstager, som er selvstændig erhvervende, kommer i arbejde udenlands. Forannævnte bestemmelser er kun gældende, hvis så er, at arbejdsløshedsforsikringen har fået besked om denne, før forsikringsmodtageren begynder skolegang, i lære eller arbejde udenlands."

3) Som ny § 13 indsættes:

"Hvis arbejdsanvisningen henviser forsikringstageren arbejde, som varer mindst en uge, medregnes ventepenge i § 12 ikke i udregningen af forsikringsudbetaling.

4) I § 20 indsættes som nyt stk. 3:

"Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse, når indkrævningen i henhold til reglerne i denne lov skal begynde."

5) §§ 13-20 bliver herefter §§ 14-21.

Undir nevndarviðgerðini hava fleiri yrkisfeløg fört fram, at ikki allir løntakarar eru javnstillaðir. Nevndin er varug við hetta og heitir á Føroya Landsstýri at viðgera hetta víðari við atliti til, at lógin verur endurskoðað um eitt ár.

Ein minniluti (Jógvan I. Olsen) førir fram soljóðandi:

Sambandsflokkurin ásannar, at samfelagið hevur ábyrgdina av teimum arbeiðsleysu. Longu í 1975 legði flokkurin soljóðandi:

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið velur eina 3-mannanevnd til gjølliga kanning av, hvussu seinni møguliga neyðugar reglur um arbeiðsloysisstuðul í Føroyum skulu leggjast til rættis.

Í viðmerkingunum til uppskotið var tá ført fram:

"Lond, sum vit hava neyvt samband við, hava fyri langari tíð síðani sett í gildi víttgangandi reglur um arbeiðsloysisstuðul. Á nógvum økjum og nýtt at kalla somu reglur sum teir.

Eftir okkara metan, er tað ikki so líka til at innflyta nakrar av teimum reglum óbroyttar, sum londini nærindis gera nýtslu av.

Undir øllum umstøðum eru vit noyddir til at síggja í eyguni, at tað her hjá okkum kunnu fara at koma fyri dømi um, at einstaklingar og/ella familjur orsakað av arbeiðsloysi koma so skeivt fyri, at neyðugt verður við størri hjálp enn gevast kann eftir nøkrum núgaldandi reglum.

Tað vildi verið skeivt at bíðað við at gjørt neyðugar kanningar, til spurningurin í fullan mun er til staðar.

Vit vilja mæla til, at umrødda nevnd verður sett, og at hon ger tær neyðugu kanningar hesum viðvíkjandi."

Uttan nevndarviðgerð setti meirilutin, Erlendur Patursson, Poul J. Olsen og Hákun Djurhuus, fram soljóðandi broytingaruppskot:

"Í samgonguskjali landsstýrisins verður sagt: Virkað verður fyri at loysa spurningin um arbeiðsloysisstudning.

Av hesum verður hildið beinast at beina málið um arbeiðsloysisstudning til viðgerðar í landsstýrinum."

Hetta uppskotið varð samtykt á tingi við 16-0 og sostatt liðið landsstýrinum til. Men málið kom ongantíð aftur úr landsstýrinum.

Orsakað av búskaparkreppuni er málið nú komið fram aftur á tingborð. Tíðin til at viðgera málið hevur verið sera stutt hjá løgtingsmonnum. Arbeiðaramálanevndin hevur bert havt 2 fundir við áhugafeløg, og nógv av hesum feløgum eru ógvuliga ónøgd við hesa skipanina og hava skotið upp ymiskar broytingar. Men vit hava skilt, at meirilutin ikki vil gera nakrar broytingar, men koyrir málið fgjøgnum soleiðis, sum tað er lagt fram av landsstýrinum.

Eitt slag av arbeiðsloysisstuðuli hevur seinastu tíðina verið útgoldin yvir vanliga forsorg á fíggjarlógini til teirra, sum einki áttu standandi inni. Hesin stuðulin hevur partvíst verið goldin av danska statinum (25%).

Eisini ber til at siga, at sum er, verður progressivur skattur goldin inn í landskassan (og harvið eisini til konto fyri vanliga forsorg), men sambart fyriliggjandi

uppskoti landsstýrisins verður nú talan um, at tann tungi endin skal venda niðureftir, av tí at tær lágu inntøkurnar lutfalsliga koma at merkja tryggingarskattin meira.

Minnilutin tekur, sum áður sagt, undir við einari arbeiðsloysisstuðulsskipan, men minnilutin kann ikki góðtaka ta loysnina, sum nú fyriliggur. Orsøkin er tann, at vit meta 2% gjaldið hjá ávikavist arbeistakara og arbeiðsgevarar at vera eykaskattur. Løntakarin má klára seg við minni í tí dagliga, meðan virkini fáa eina eykabyrðu í eini tíð, tá ið tey frammanundan hava ilt við at klára útreiðslurnar.

Tað verða serliga tey lønartungu virkini í útflutingsvinnuni, sum koma at merkja byrðuna harðast, meðan agenturvirki og onnur lønarløtt virki sleppa lættari. Vit mugu ikki gloyma, at tað verður torførari hjá útflutningsvinnuni at skapa nýggj arbeiðspláss, tá ið byrðarnar økjast. Hóast lítlan og ongan skatt er vinnan í stórum fíggjarligum trupulleikum. Tað er tí óðamannaverk at krevja 80 mió. inn frá vinnuni árliga, og úrslitið má sjálvsagt vera, at fleiri fólk verða send til hús. Eins og fyri vinnuna fer 2%-gjaldið eisini at virka sum ein eykaskattur hjá tí einstaka, sum frammanundan er sperdur av skatti og gjøldum.

Minnilutin mælir tí til, at peningurin til arbeiðsloysisstuðulin verður fingin til vega yvir fíggjarlógina. Hetta kann partvíst gerast við at fremja sparingar innan fløguvirksemi (so sum Sambandsflokkurin í minnilutaáliti til fíggjarlógina hevur víst á) og við at privatisera alment virksemi. Aðaltreytin er tó tann, at hallið á fíggjarlógini ikki verður økt, og at landsstýrið ikki leggur nýggj gjøld á borgara og/- ella virki.

Minnilutin vísir á, at stórur vandi er fyri, at arbeiðsloysistryggingin verður ein mylnusteinur fyri bæði lønmóttakara og vinnulív og minnir á orðingina til meginreglurnar í álitinum hjá arbeiðsbólkinum, har sagt verður soleiðis:

Um tíðirnar versna, og peningur kemur at vanta í, verður tað upp til partarnar á arbeiðsmarknaðinum sjálvar at krevja inn tann pening, sum restar í.

Hetta merkir í veruleikanum, at um 2%-gjaldið ikki røkkur hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, verður prosentið hækkað eftir tørvi.

Minnilutin metir, at landsstýrissamgongan við hesum uppskoti hevur sloppið sær undan skyldu síni at loysa spurningin um arbeiðsloysisstuðulin yvir fíggjarlógina, og at samgongan við hesum sleppur at spreingja 50% skattahámarkið.

Vísandi til hear viðmerkingar, setir minnilutin (Jógvan I. Olsen) fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka løgtingsmál nr. 77/1991 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing aftur, og leggja tað fram á tingborð í broyttum líki so-

leiðis at arbeiðsloysisstuðulin verður fíggjaður yvir fíggjarlógina, partvís við at privatisera alment virkseimi og partvís við sparingum.

Ein annar minniluti (Signar Hansen) ger hesar viðmerkingar:

Tað stóra og alsamt vaksandi arbeiðsloysið er ein vanlagna fyri mangan einstakling og fyri tjóðina alla. Hóast lyfti um, at tað fór at ganga frammá, og at arbeiði skjótt fór at verða til allar hendur, hevur talið á arbeiðsleysum ongantíð verið so stórt sum nú.

Minnilutin tekur fult út undir við, at ein arbeiðsloysisgrunnur verður stovnaður, sum kann tryggja teimum arbeiðsleysu inntøku. Longu í 1965 legði ein landsstýriðmaður fyri Tjóðveldisflokkin fram uppskot á ting um, at ein nevnd varð sett at kanna og leggja til rættis eina almenna arbeiðsloysisskipan. Uppskotið varð samtykt, men síðani frættist einki aftur um málið.

Síðst í sekstiárunum var Tjóðveldisflokkurin við til at fáa eina játtan á fíggjarlógina til arbeiðsloysisgrunnar hjá arbeiðarafeløgum og hevur síðani verið við til at samtykt játtanir árliga til hetta endamál.

Síðani arbeiðsloysið av álvara fór at gera vart við seg í Føroyum, hava tey arbeiðsleysu bert havt ein møguleika fyri at fáa hjálp. Hesin møguleiki hevur verið at vent sær til Almannastovuna við umsókn um forsorgarhjálp. Hesin stuðul, sum er skattafrír, hevur munað væl hjá teimum, sum hava fingið hann, men ein veikleiki við skipanini hevur verið, at ikki øll arbeiðsleys eru komin undir hana. Fyri at hjálp skal fáast gjøgnum almennu forsorgina, skulu ávísar treytir lúkast, sum einki hava við arbeiðsloysi at gera, m.a. at tann, sum søkir, ikki má eiga nakað av samanspardum peningi.

Tað er tí átrokandi neyðugt, at ein skipan fæst nú, sum ufatar øll arbeiðsleys.

Fyriliggjandi uppskot er eitt stig tann vegin, men minnilutin fer kortini at vísa á ymsar veikleikar við uppskotinum.

1. Hetta uppskot hevur - sum mong onnur uppskot frá sitandi samgongu - tann veikleika, at ov lítið stendur í sjálvari lógini, og ov nógv verður litið upp í hendurnar á umsitingini. Sagt verður, at hetta er ein rammulóg, sum skal fyllast út so við og við. Fyri allar partar, serliga arbeiðarafjøldina, hevði tað verið tryggari, um skipanin var meira gjøgnumarbeidd, áðrenn hon verður sett í verk. Serliga er vert at finnast at, at ongar reglur eru gjørdar fyri, hvussu fiskimenn og útróðrarmenn kunnu fáa arbeiðsloysisstuðul.

2. Eftir skipanini minkar stuðulin viku eftir viku av tí, at útgjaldið alla tíðina verður roknað av inntøkuni 12 teir seinastu mánaðirnar. Hvør einstøk arbeiðsleys vika, ávirkar útrokningargrundarlagið niðureftir. Um eitt fólk er arbeiðsleyst í longri tíð, minkar útgjaldið soleiðis, sum víst er niðanfyri:

1. vika kr. 2.379
20. " " 2.035
30. " " 1.809
40. " " 1.547
52. " " 1.174

3. Landsstýrið upplýsir, at mesta útgjald, sum ein arbeiðsleysur kann fáa, er 108.000 kr. um árið. Verða útgjøldini viku eftir viku løgd saman í 52 vikur, síggja vit, at 108.000 kr. er bert eitt fiktivt tal, tí tann, sum gongur arbeiðsleysur í eitt heilt ár út í eitt, kemur ikki hægri upp enn á í mesta lagi 96.319 kr.

4. Skipanin verður fíggjað á tann hátt, at allir løntakarar skulu gjalda ein prosentpart av lønini, og allir arbeiðsgevarar, almennir og privatir, skulu gjalda 2% av einari ársløn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag pluss 15%. Hetta hevur við sær, at í krónum og oyrum koma næstan allir løntakarar at gjalda tað sama, men í prosentum verður tann lægri lønti nógv harðari raktur enn tann hægri lønti.

5. Talan er ikki longur um eina arbeiðsloysistrygging, men eina tvungna skipan. Sum nevnt omanfyri koma tær hægru lønirnar at gjalda minni í prosentum enn tær lægru lønirnar, men samstundis verður útgjaldið prosentvís minni fyri tær hægru lønirnar. Tað hevði verið vert at kannað, um skipanin ikki hevði verið betri við javnari prosentvísum inn- og útgjaldi. Fyri tað samlaða útgjaldið hevði hetta neyvan havt negativa ávirkan, eftirsum tey flestu hægru løntu eru í føstum starvi og tí í minni vanda fyri at gerast arbeiðsleys.

6. Innkrevjingarskipanin er saman við gjaldinum til Tann Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin rættiliga tyngjandi fyri tær lægru inntøkurnar. Hesi dømi kunnu nevnast um, hvussu nógv verður goldið (2% av bruttoløn til arbeiðaloysisskipan og eitt hálvt % av skattskyldugari inntøku til tann Samhaldsfasta):

Ein inntøka upp á 110.000 kr. skal av við 2.703 kr.
Ein inntøka uppá 154.300 kr., ið er ein arbeiðsmannaløn, skal av við 3.810 kr.
Ein inntøka upp á 180.000 kr. skal av við 4.402 kr.

Men síðani minkar gjaldið lutfalsliga, sum hesi dømi vísa:

Ein inntøka upp á 360.000 kr. skal av við 5.302 kr.
Ein inntøka upp á 500.000 kr. skal av við 6.002 kr.

Um bert verður roknað við gjaldinum til arbeiðsloysisskipanina, gerst myndin uppaftur misjavnari:

Ein inntøka upp á 110.000 kr. skal av við 2.200 kr. (2%)
Ein inntøka upp á 180.000 kr. skal av við 3.549 kr. (2%)
Ein inntøka upp á 250.000 kr. skal av við 3.549 kr. (1,4%)
Ein inntøka upp á 500.000 kr. skal av við 3.549 kr. (0,7%)

Ein lætti liggur kortini í tí, at gjaldið til arbeiðsloysisskipanina kann dragast frá skattskyldugu inntøkuni. Harafturímóti verður útgjald frá skipanini skattað, meðan útgjald gjøgnum almennu forsorgina er skattafrítt.

Nøkur fakfelagsfólk hava verið við til at gjørt fyriliggjandi uppskot. Mong fakfeløg hava funnist at skipanini, men kunnu kortingi taka undir við uppskotinum sum eina byrjan. Standurin er so ringur at arbeiðarafjøldin, sum rímuligt er heldur, at allur bati bøtur.

Minnilutin tekur somu støðu sum hesi mongu fakfeløg, tí politiskur møguleiki er ikki fyri at fáa eina betri skipan setta í verk nú. Minnilutin mælir tí tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

78. Broyting í løgtingslóg um skráseting av skipum

Løgtingslóg

um

Broyting í løgtingslóg um skráseting av skipum.

Samsvarandi samtykt Føroya løgtings staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Yvirskriftin til partin § 1 f.f. verður broytt til:

Ændring i lagtingslov om registrering af skibe.

I overenstemmelse med vedtagelse af Færøernes lagting stadfæster og kundgør lagmanden følgende lagtingslov:

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 5. marts 1970 om registrering af skibe foretages følgende ændringer:

1. Afsnitsbetegnelsen til § 1 f.f. ændres til:

"I

Skráseting av størri skipum.
A. Skráseting av skipum og skipum í gerð:"

2. § 1 verður orðað soleiðis:

"Føroysk skip, sum eru liðugt bygd og hava eitt bruttoregistaratonsatal/bruttotonsatal uppá 20 tons ella meira, skal av eigaranum meldast til skráseting. Landsstýrið kann í serstøkum føri loyva skráseting av skipi, hóast treytirnar eftir stk. 2-3 eru ikki hildnar.

Stk. 2. Fyri at skip skal kunna metast sum føroyskt og sigla undir føroyskum flaggi, má eigarin vera føroyskur. Sum føroyskur eigari verður mettur:

a. Føroyingar.
b. Føroyskir landsstovnar og kommunur.
c. Stovnanargrunnar og felǿg, har bert føroyingar eru í leiðsluni.
d. Partsreiðarí, har føroyingar eiga í minsta lagi tveir triðingar og har fyrisitandi reiðarin er føroyingur.
e. Partafelǿg og onnur vinnufelǿg við avmarkaðari ábyrgd, sum hava valt eina nevnd, tá ið í minsta lagi tveir triðingar av hesari eru føroyingar.
f. Onnur vinnufelǿg, har í minsta lagi tveir triðingar eru føroyingar.

Stk. 3. Um stovnanargrunnar, felǿg ella vinnufelǿg eru luttakarar í partsreiðarínum ella í teimum í lit-

"I

Registrering af større skibe.
A. Registrering af skibe og skibe under bygning:"

2. I affattes således:

"Færøske skibe, som er færdigbyggede og har en bruttoregistertonnage/en bruttotonnage på 20 tons eller derover, skal af ejeren anmeldes til registrering. Landsstyret kan i særlige tilfælde tillade registrering af skibe, selv om betingelserne efter stk. 2-3 ikke er opfyldt.

Stk. 2. For at et skib kan anses som færøsk og sejle under færøsk flag, må dets ejer være færøsk. Som færøsk ejer anses:

a. Færinger.
b. Færøske landsinstitutioner og kommuner.
c. Stiftelser og foreninger, hvis ledelse udelukkende består af færinger.
d. Partsrederier, hvoraf mindst to trediedele ejes af færinger, og hvis bestyrende reder er færing.
e. Aktieselskaber og andre selskaber med begrænset ansvar, der har valgt en bestyrelse, når mindst to trediedele af denne består af færinger.
f. Andre selskaber, hvoraf mindst to trediedele består af færinger.

Stk. 3. Såfremt stiftelser, foreninger eller selskaber er deltagere i partsrederier eller i de i litra f. nævn-

ra f. nevndu vinnufeløgum, má hvør einstakur luttakari lúka treytirnar fyri at verða mettur sum føroyskur eigari."

3. *§ 2 verður orðað soleiðis:*
"Skip, sum standa í útlendskari skipaskrá, kunnu ikki skrásetast her á landi.

Stk. 2. Flótidokkir, kaðaltrumlur, flótandi fløt og onnur líknandi amboð verða ikki mett sum skip eftir hesi lóg.

Stk. 3. Prámar, lossingarbátar, dýpingarmaskinur, flótikranar og líknandi verða at meta sum skip, men eru undantikin tilmelding sambært § 1, um so er, at tey ikki eru gjørd út við maskinu til framtøku."

4. § 4, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Skip í gerð her í landinum kunnu eftir áheitan verða tikin upp í serstaka deild í skipaskránni (skipabyggingarskráin), um so er, at tað eftir váttan frá skipaeftirlitinum er so mikið ávegis, at tað nóg gjølla kann eyðkennast, og um tess bruttoregistaratonsatal/bruttotonsatal eftir váttan frá skipaeftirlitinum kann metast at vera í minsta lagi 20 tons ella meira."

5. § 4, stk. 4, verður strikað.

6. § 5, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"Við tilmeldingini skulu fylgja tørvandi prógførslur, at tilmeldarin er eigari av skipinum, og tað skal

3. *§ 2 affattes således:*
"Skibe, der er optaget i udenlandske skibsregistre, kan ikke registreres her i landet.

Stk. 2. Flydedokke, kabeltromler, flydende beholdere og andet lignende materiel anses ikke som skibe ved anvendelsen af denne lovs regler.

Stk. 3. Pramme, lægtere, uddybningsmaskiner, flydekraner og lignende anses som skibe, men er undtaget fra anmeldelsespligten i medfør af § 1, for så vidt de ikke er forsynet med maskineri til fremdrivning."

4. § 4, stk. 1, affattes således:
"Skibe, som er under bygning her i landet, kan på begæring optages i en særlig afdeling i skibsregisteret (skibsbygningsregisteret), hvis skibets bygning ifølge erklæring fra skibstilsynet er så vidt fremskredet, at skibet på betryggende måde kan identificeres, og hvis dets bruttoregistertonnage/bruttotonnage ifølge erklæring fra skibstilsynet skønnes at ville blive mindst 20 tons eller derover."

5. § 4, stk. 4, ophæves.

6. § 5, stk. 2, affattes således:
"Anmeldelsen skal være ledsaget af de fornødne bevisligheder for, at anmelderen er ejer af skibet, og det

undantikið tá ið talan er um tilmelding av skipum í gerð, prógvførast, at treytirnar eftir § 1 eru hildnar."

7. § 5, stk. 7, verður orðað soleiðis:

"Tilmelding av navni kann gerast, tá ið skip í gerð verður skrásett eftir § 4 ella um so er, at treytirnar fyri tílíkari skráseting eru hildnar.

8. § 6, stk. 1, síðsta pkt., verður orðað soleiðis:

"Eru eigarar skipsins eitt partsreiðarí, skal ein fyrisitandi reiðari verða valdur, sum lýkur treytirnar í § 1, og tilmelding gevast um hetta."

9. § 7 verður orðað soleiðis:

"Um so er, at skip er fingið úr út landinum, má somuleiðis útvegast váttan frá útlendskum skráseting-arvaldi, at skipið ikki er tikið upp í avvarðandi útlendsku skipaskrá ella skipabyggingarskrá, ella at tað verður strikað av skránni tann dagin, tað verður prógvført, at skipið er tikið upp í skrá í øðrum landi.

Stk. 2. Leiðarin av skipaskránni kann í serstøkum førum skráseta, hóast váttan ikki er fingin til vega frá útlendska skráseting-arvaldinum. Skráseting kann tó bert fara fram um so er, at landið, sum skipið er fingið úr, ella hvørs skipa- ella skipabyggingarskrá tað hevur staðið í, hvørki hevur tikið við millumlanda sáttmálanum frá 1967 um

skal, bortset fra anmeldelse af skibe under bygning, godtgøres, at betingelserne efter § 1 er opfyldt."

7. § 5, stk. 7, affattes således:

"Anmeldelse af navn kan finde sted, når der foretages registrering af skib under bygning efter § 4, eller såfremt betingelserne for foretagelse af sådan registrering er opfyldt."

8. § 6, stk. 1, sidste pkt., affattes således:

"Ejes skibet af et partsrederi, skal der vælges en bestyrende reder, der opfylder begingelserne i § 1, og anmeldelse foretages herom."

9. § 7 affattes således:

"Er et skib erhvervet fra udlandet, skal der tillige tilvejebringes attest fra den udenlandske registreringsmyndighed om, at skibet ikke er optaget i vedkommende udenlandske skibsregister eller skibsbygningsregister, eller at det vil blive udslettet af registret den dag, det godtgøres at være optaget i et andet lands skibsregister.

Stk. 2. Lederen af skibsregistret kan i særlige tilfælde foretage registrering, selv om der ikke er tilvejebragt attest fra den udenlandske registreringsmyndighed. Registreringen kan dog kun ske, såfremt det land, fra hvilket skibet erhverves, eller i hvis skibs- eller skibsbygningsregister det har været indført, hverken har tiltrådt den internatio-

gerð av ávísum einsháttaðum reglum viðvíkjandi sjópantirættindum og øðrum pantirættindum í skipum ella millumlandasáttmálanum frá 1967 um skráseting av rættindum í skipum í gerð.

Stk. 3. Um so er, at skip er fingið frá útlandinum, skulu pantirættindi, sum eru nevnd í tí í stk. 1 nevndu strikingarváttan ella sum kunnu prógførast av panthavaranum, og sum lúka treytirnar í § 259 í sjólógini, flytast til skipaskránna samstundis sum skipið verður skrásett eftir reglum, sum nærri verða ásettar av landsstýrinum."

10. § 8 verður orðað soleiðis:

"Skráseting fer fram við innførslu í eina skipaskrá fyri alt landið í Tórshavn. Landsstýrið ásetir nærri reglur um fyrisiting av skipaskránni. Leiðarin av skipaskránni skal vera løgfrøðingur."

11. Í § 23, stk. 1, 1. pkt., verður "§§ 5-6" broytt til: "§§ 4-5".

12. § 26 verður orðað soleiðis:

"Skip verður strikað úr skipaskránni, tá ið eigarin ikki longur sambært § 1 er at meta sum føroyskur eigari, ella skipið verður latið ella fer til onkran, sum kann ikki metast sum føroyskur eigari, jbr. tó 29, stk. 3.

Stk. 2. Haraftrat verður skip strikað, tá ið tað verður høgt upp, gongur burtur, spyrst ikki aftur ella

nale konvention af 1967 om indførelse af visse ensartede regler angående søpantrettigheder og andre panterettigheder i skib eller den internationale konvention af 1967 om registrering af rettigheder i skibe under bygning.

Stk. 3. Er et skib erhvervet fra udlandet, skal panterettigheder, der er anført i den i stk. 1 omhandlede udslettelsesattest, eller, hvis eksistens godtgøres af pantehaveren, og som opfylder betingelserne i sølovens § 259, overføres til skibsregistret samtidig med skibets registrering efter nærmere af landsstyret fastsatte regler."

10. § 8 affattes således:

"Registreringen sker ved indføjelse i et skibsregister for hele landet. Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om administrationen af skibsregistret. Lederen af skibsregistret skal være jurist."

11. I § 23, stk. 1, 1. pkt., ændres "§§5-6" til: "§§ 4-5".

12. § 26 affattes således:

"Et skib udslettes af skibsregistret, såfremt ejeren ifølge § 1 ikke længere kan anses som færøsk ejer, eller skibet overdrages eller overgår til nogen, som ikke kan anses som færøsk ejer, jfr. dog § 29, stk. 3.

Stk. 2. Endvidere udslettes skibe, der ophugges, forliser, forsvinder eller af udmeldte syns- og skøns-

verður hildið ikki at kunnu gerast aftur, av uppnevndum sýns- og metingarmonnum, av góðkendum klassafelag, ella á annan hátt, ið kann metast javnt við hetta, jbr. tó 29, stk. 3.

Stk. 3. Skip, sum verður selt á tvingsilsuppboðssølu í útlandinum til onkran, sum sambært § 1 ikki kann metast sum føroyskur eigari, verður bert strikað úr skipaskránni, um so er, at skipið, tá tað varð selt, var statt í tí ríkinum, har tvingsilsuppboðssølan fór fram, og treytað av, at sølan hendi sambært lóggávuni í avvarðandi ríki og millumlandasáttmálanum frá 1967 um gerð av einsháttaðum reglum viðvíkjandi sjópantirættindum og øðrum pantirættindum í skipum.

Stk. 4. Skip, sum er tikið upp í skipabyggingarskránna, verður strikað, tá ið skipið verður avhendað frá skipasmiðjuni, jbr. tó § 29, stk. 3. Harumframt verður skip strikað úr skipabyggingarkránni, um tað fer fyri skeyti, meðan tað stendur í gerð, jbr. stk. 2."

13. § 29 verður orðað soleiðis:

"Striking má ikki fara fram, fyrrenn skipaskráin hevur sent tilmeldaðum rættindahavarum frásøgn, og 30 dagar eru lidnir frá tí, at frásøgnin er send, uttan so at teir tilmeldaðu rættindahavararnir geva sítt skrivliga samtykki til strikingina, ella tað er prógført, at rættindini

mænd, af et godkendt klassifikationsselskab eller ved en anden fremgangsmåde, der kan ligestilles hermed, erklæres for uistandsættelige, jfr. dog § 29, stk. 3.

Stk. 3. Et skib, der sælges ved tvangsauktion i udlandet til nogen, der ifølge § 1 ikke kan anses som færøsk ejer, udslettes kun af skibsregistret, såfremt skibet på salgstidspunktet befinder sig i den stat, hvor tvangsauktionen finder sted, og under forudsætning af, at salget er sket i overensstemmelse med vedkommende stats lovgivning og den internationale konvention af 1967 om indførelse af visse ensartede regler angående søpanterettigheder og andre panterettigheder i skib.

Stk. 4. Et skib, der er optaget i skibsbygningsregisteret, udslettes, når skibet afleveres af værftet, jfr. dog § 29, stk. 3. Endvidere udslettes skibet af skibsbygningsregisteret, såfremt det går tabt, medens det er under bygning, jfr. stk. 2."

13. § 29 affattes således:

"Udslettelse af skibsregistret må ikke finde sted, forinden der af skibsregisteret er sendt meddelelse herom til indehavere af anmeldte rettigheder, og der er forløbet en frist på 30 dage fra meddelelsens afsendelse, medmindre de anmeldte rettighedshavere giver skriftligt

eru burturdottin.

Stk. 2. Striking kann tó ikki fara fram, um so er, at tað verður upplýst, at tilmeldaður rættindahavari hevur gjørt rættsligt stig at útinna sín rætt í skipinum, uttan so at søksmál verður ikki framt uttan óneyðugan seðg ella í endaligari avgerð fær sýtt hennara frama.

Stk. 3. Striking kann heldur ikki verða framd, um so er, at skrásett eru pantirættindi í skipinum, uttan so at rættindahavararnir av skrásettu rættindunum geva sítt skrivliga samtykki til strikingina. Ístaðin verður í skipsblaðnum skrivað ein viðmerking um tey viðurskifti, sum skuldu vera orsøk til strikingina, og tað kann hereftir ikki verða skrásett rættindi í skipinum. Rætturin til at sigla undir føroyskum flaggi og rætturin til navnið hjá skipinum dettur burtur. Tjóðskaparbræv skipsins skal tatast skipaskránni sambært § 27, stk. 2.

Stk. 4. Verður eitt skip meldað til strikingar fyri at verða flutt til útlendska skrá og eru treytirnar fyri striking loknar, váttar skipaskráin eftir ábeitan, at skipið er strikað ella verður strikað úr skipaskránni sama dag, sum tað verður prógvført, at tað er tikið upp í útlendsku skránna, tó ikki seinni enn 30 dagar eftir, at váttanin er givin. Er tílík váttan givin, kunnu rættindi ikki

samtykke til udslettelsen, eller det godtgøres, at rettighederne er bortfaldet.

Stk. 2. Udslettelse kan dog ikke finde sted, hvis det oplyses, at en anmeldt rettighedshaver har foretaget retslige skridt til gennemførelse af sin ret over skibet, medmindre retsforfølgningen ikke fremmes uden uformødent ophold eller ved endelig afgørelse nægtes fremme.

Stk. 3. Udsletelse kan heller ikke finde sted, hvis der er registreret panterettigheder i skibet, medmindre indehaverne af de registrerede panterettigheder giver skriftligt samtykke til udslettelsen. I stedet anføres der på skibsbladet en bemærkning om det forhold, der skulle give anledning til udslettelse, og der kan herefter ikke registreres rettigheder i skibet. Retten til at lade skibet sejle under færøsk flag og retten til skibets navn fortabes. Skibets nationalitetsbevis skal afleveres til skibsregisteret i overensstemmelse med § 27, stk. 2.

Stk. 4. Anmeldes et skib til udslettelse af skibsregistret for at blive overført til udenlandsk register og er betingelserne for udslettelse af skibet til stede, udsteder skibsregistret på begæring en erklæring om, at skibet er udslettet eller vil blive udslettet af skibsregistret samme dag, det godtgøres at være optaget i det udenlandske register, dog senest 30 dage fra erklæring-

longur verða meldað til skráseting-ingar.

Stk. 5. Eru rættindi skrásett á skipsblaðnum í skipaskránni, tá skipið verður strikað, skal váttanin um, at skipið er strikað upplýsa um, hvørjar hesar eru."

14. § 30 verður orðað soleiðis:

"Skip verður ikki strikað úr skipaskránni, um tað skuldi verið sett við ummáling til eitt bruttoregistartonsatal/bruttotonsatal undir 20 tons."

15. § Yvirskriftin til 3 f.f. verður broytt til:

"B. Skráseting av rættindum:"

16. Í § 33 verður "pantirættindi eftir § 17 í sjólógini" broytt til:

"afturhaldsrættindi".

17. Í § 38, stk. 1, verður "samtykki" broytt til:

"skrivligt samtykki".

18. Til § 38, stk. 2, kemur sum nýtt 2. pkt.:

"Pantibrøv til ríkiskassan, landskassan og teir av hesum stovnaðu lánistovnar kunnu tó eftir avgerð frá leiðaranum av skipaskránni strikast móti kvittan frá rættindahavaranum sambært skipaskránni."

19. Í § 40, stk. 3, verður " § 7, stk. 2" broytt til: " § 7, stk. 3".

20. § 40, stk. 4, verður strikað.

21. Í § 41, stk. 3, verður "§ 7, stk. 2 ella § 40, stk. 4" broytt til: "§ 7, stk. 3".

ens udstedelse. Er sådan erklæring udstedt, kan rettigheder ikke længere anmeldes til registrering.

Stk. 5. Henstår der ved skibets udslettelse rettigheder på skibets blad i skibsregistret, skal attest om skibets udslettelse give oplysning om disse rettigheders indhold."

14. § 30 affattes således:

"Et skib udslettes ikke af skibsregistret, selv om det ved ommåling ansættes til en mindre bruttoregistertonnage/bruttotonnage end 20 tons."

15. Afsnitsbetegnelsen til 31 f.f. ændres til:

"B. Rettighedsregistrering:"

16. I § 33 ændres "de i sølovens § 17 nævnte panterettigheder" til:

"tilbageholdelsesrettigheder".

17. I § 38, stk. 1, ændres "samtykke" til:

"skriftligt samtykke".

18. Til § 38, stk. 2, føjes som nyt 2. punktum:

"Pantebreve til statskassen, landskassen og de af disse etablerede låneinstitutioner kan dog efter bestemmelse af lederen af skibsregistret udslettes mod kvittering af den ifølge skibsregistret berettigede."

19. I § 40, stk. 3, ændres "§ 7, stk. 2," til: " § 7, stk. 3,".

20. § 40, stk. 4, ophæves.

21. I § 41, stk. 3, ændres "§ 7, stk. 2, eller § 40, stk. 4" til: "§ 7, stk. 3".

22. Yvirskriftin til partin § 43 verður broytt til:

"II

Skráseting av smærri skipum v. m.

A. Skráseting í farskránni".

22. Afsnitsbetegnelsen til § 43 ændres til:

"II

Registrering af mindre skibe m. m.

A. Registrering i fartøjsfortegnelsen".

23. § 43, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"Før, hvørs bruttoregistaratonsatal/bruttotonsatal er undir 20 tons, og før, sum samkvæmt § 2, stk. 3 eru undantikin tilmelding til skipaskránna, skulu melda til farskránna í teirri sýsluni, sum tey hava heimstað. Tilmeldingarskyldan er treyt að av, at farið er liðugt bygt og er føroysk ogn, jbr. § 1."

23. § 43, stk. 1, affattes således:

"Skibe hvis bruttoregistertonnage/-bruttotonnage er mindre end 20 tons, og skibe, som i medfør af § 2, stk. 3, er undtaget fra anmeldelsespligten til skibsregistret, skal anmeldes til fartøjsfortegnelsen i det syssel, hvor skibet hører hjemme. Anmeldelsespligten er betinget af, at skibet er færdigbygget og i færøsk eje, jfr. § 1."

24. Yvirskriftin til partin §§ 44-47 verður broytt til:

"B. Skráseting í skipaskránni:"

24. Afsnitsbetegnelsen til §§ 44-47 ændres til:

"B. Registrering i skibsregistret:"

25. § 44, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"Før, sum koma undir reglurnar í § 43 og harumpil stuttleikaður, kunnu koma inn í skipaskránna, tá ið eigari biður um tað, um so er, at farið er mált upp ella við upptøku í skipabyggingarskránna ætlast til eitt bruttoregistaratonsatal/bruttotonsatal uppá 5 tons ella meira."

25. § 44, stk. 1, affattes således:

"De i § 43 omhandlede skibe, herunder lystfartøjer, kan på ejerens begæring optages i skibsregistret, hvis det er målt til eller ved optagelsen i skibsbygningsregistret skønnes at ville blive målt til en bruttoregistertonnage/bruttotonnage på 5 tons eller derover."

26. Í § 44, stk. 2, verður "§ 5, stk. 4" broytt til: "§ 5, stk. 5".

26. I § 44, stk. 2, ændres "§ 5, stk. 4" til: "§ 5, stk. 5".

27. Yvirskriftin til partin § 48 f.f. verður broytt til:

27. Afsnitsbetegnelsen til § 48 f.f. ændres til:

"III
Almennar reglur:"

"III
Almindelige bestemmelser:"

28. § 48, stk. 2, verður orðað soleiðis:

"Harafturat koma undir skrásett

28. § 48, stk. 2, affattes således:

"Endvidere omfatter en registre-

rættindi í skipi, sum er komið inn í skipabyggingarkránna, tilfar, sum útvegað er til skipið og sum liggur fyri seg á skipasmiðjuøkinum og merkt til skipið. Verða partar av skipinum gjørdir á øðrum virki í Føroyum, í Danmark ella Grønlandi, og liggja partarnir fyri seg á virkinum og eru teir merktir til skipið, kann tað avtalast, at partarnir konna undir skrásettu rættindini. Avtalan verður bert virkin, um so er, at hon er góðkend av skipasmiðjuni, virkinum og byggiharranum."

29. Eftir § 49 verður sett:

"**§ 49 a.** Er tað í einum pantibrævi ásett, at høvuðsstólur og restskuld fylgir einum ávísum indeksi (indekspantibrævi), kann tað uttan avmarkingar av § 49, stk. 3, 1. pkt. í einum aftanfyri standandi pantibrævi gyldugt samtykkjast, at pantirættur tess tekur seg fram, so hvørt sum indekspantibrævið verður avdrigið ella verður innloyst við gjøldum, sum eru tíðarfest sambært pantibrævinum. § 49, stk. 3, 2.-4. pkt. verða at nýta samsvarandi.

§ 49 b. Verður eitt leyst pláss í veðrættarskipanini sett við einum indekspantibrævi, og veksur pantirætturin orsakað av indeksskipanini úttum tað leysa plássið, fær tann parturin av pantirættinum, sum pláss ikki er fyri, veðrætt eftir øllum aftanfyri standandi og javnbjóðis rættindahavarum í skipinum, sum

ret ret over et skib, som er optaget i skibsbygningsregistret, de til skibet anskaffede materialer, der er individualiserede inden for værftets område og påmærket som vedrørende skibet. Bygges dele af skibet på anden virksomhed på Færøerne, i Danmark eller Grønland, og er delene individualiseret i den pågældende virksomhed og påmærket som vedrørende skibet, kan det aftales, at delene er omfattet af den registrerede ret. Aftalen har kun virkning, hvis den er godkendt af værftet, virksomheden og bygherren."

29. Efter § 49 indsættes:

"**§ 49 a.** Er det i et pantebrev fastsat, at hovedstol og restgæld reguleres i takt med et bestemt indeks (indeks- pantebrev), kan det uanset § 49, stk. 3, 1. pkt., i et efterstående pantebrev gyldigt vedtages, at panteretten ifølge dette rykker op, efterhånden som indekspanteretten afdrages eller indfries ved betalinger, der efter pantebrevet er tidsfæstende. § 49, stk. 3, 2.-4. pkt. finder tilsvarende anvendelse.

§ 49 b. Besættes en ledig plads i prioritetsordenen med et indekspantebrev, og medfører den fastsatte indeksregulering, at panteretten overstiger den ledige plads, får den overskydende del af panteretten prioritet efter samtlige efterstående og sideordnede berettigede i skibet på tidspunktet for indeks-

vóru um tað mundið, indekspantibrævið varð stovnað. Eigarin kann tilskila sær eitt annað ávíst leyst pláss til víðkanir av indekspantirættinum.

Stk. 2. Teir í stk. 1, 1. pkt., nevndu aftanfyri standandi rættindahavarar, sum smb. § 49, stk. 3, ella § 49 a hava rætt til at taka seg fram eftir einum eldri frammanfyri standandi pantirætti, taka seg eftir skrásetingina av indekspantibrævinum fram í tann mun, teir eftir innihaldinum av eldra pantirættinum høvdu rætt til hetta. Tann parturin av indekspantirættinum, sum sambært hesum verður otaður burtur frá plássinum hjá frammanfyri standandi pantirættinum, fær somu veðrættarstøðu, sum avlopspantirætturin, smbr. stk. 1.

Stk. 3. Er eitt leyst pláss í veðrættarskipanini sett við einum indekspantibrævi, kann ein av teimum í stk. 1, 1. pkt., nevndu aftanfyri standandi ella javnbjóðis rættindahavaranum, sum á tvingsilsuppboði ikki fáa fulnað, krevja skipið selt av nýggjum við teirri treyt, at indeksskipanin framyvir fellur burtur. Indeksskipanin fellur tó ikki burtur í tann mun, at víðkanir av indekspantirættinum kunnu rúmast á plássum, sum tilskilað eru hesar víðkanir framum nevndu rættindahavarar og sum hava fingið fulnað. 1. pkt. verður ikki at nýta, um so er, at indeksskipanin

pantebrevets oprettelse. Ejeren kan dog forbeholde en bestemt anden ledig plads for udvidelser på indekspanteretten.

Stk. 2. De i stk. 1, 1. pkt., nævnte efterstående berettigede, der efter § 49, stk. 3, eller § 49 a har oprykningsret efter en tidligere foranstående panteret, rykker efter registreringen af indekspantebrevet op, i det omfang de efter indholdet af den tidligere panteret havde ret hertil. Den del af indekspanteretten, som herefter fortrænges fra den foranstående panterets plads, får samme prioritet som overskydende dele af panteretten efter stk. 1.

Stk. 3. Er en ledig plads i prioritetsordenen blevet besat med et indekspantebrev, kan en af de i stk. 1, 1. pkt., nævnte efterstående eller sideordnede berettigede, der på tvangsauktion ikke opnår fuld dækning ved det afgivne bud, forlange skibet opråbt på ny på vilkår, at indeksreguleringen for fremtiden tilsidesættes. Indeksreguleringen kan dog ikke tilsidesættes, i det omfang udvidelser på indekspanteretten kunne rummes på pladser, som er forbeholdt for sådanne udvidelser forud for de nævnte berettigede, og som har opnået dækning ved auktionsbuddet. 1. pkt. finder

ikki kann hava við sær, at pantirætturin veksur út um tað leysa plássið.

Stk. 4. Stk. 1-3 eru ikki galdandi fyri teir í stk. 1, 1. pkt., nevndu aftanfyri standandi ella javnbjóðis rættindahavarar, sum hava játtað, at leysa plássið verður sett við indekspantibrævinum."

30. Í § 52 í danska tekstinum verður "Chefen for skibsregistret" broytt til: "Skibsregistret".

31. § 53, stk. 1, 3. pkt., verður orðað soleiðis:

"Um fakkunnleiki til viðurskifti um sjógvin verða mett at hava týdning, kann rætturin senda boð eftir 2 sjókønum dómarum, sum verða valdir millum teir, sum eru settir av løgmálaráðnum smb. § 6, stk. 4, í rættargangslógini."

32. Í § 53, stk. 3, í danska tekstinum verður "af ham" strikað.

33. § 57 verður orðað soleiðis:

"Brot móti §§ 1-7, 17, 22-25, 27 og 43 koma undir bót. Sama er galdandi fyri tann, sum hevur ábyrgdina av, at skip siglir undir føroysk um flaggi uttan at hava rætt til hetta.

Stk. 2. Í reglum, sum verða gjørdar av landsstýrinum við heimild í lógini, kann verða ásett, at brot móti reglunum koma undir bót.

Stk. 3. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bótarábyrgd verða áløgd virkinum

ikke anvendelse, såfremt den fastsatte indeksregulering ikke kan medføre, at panteretten overstiger den ledige plads.

Stk. 4. Stk. 1-3 gælder ikke i forhold til de i stk. 1, 1. pkt., nævnte efterstående eller sideordnede berettigede, som har samtykket i besættelsen af den ledige plads med indekspantebrevet."

30. I § 52 ændres i den danske tekst "Chefen for skibsregistret" til: "Skibsregistret".

31. § 53, stk. 1, 3. pkt., affattes således:

"Hvis fagkundskab til søforhold skønnes at være af betydning, kan retten tilkalde 2 søkyndige dommere, der udtages af de af Justitsministeriet i medfør af retsplejelovens § 6, stk. 4, beskikkede dommere."

32. I § 53, stk. 3 i den danske tekst udgår "af ham".

33. § 57 affattes således:

"Den, der overtræder §§ 1-7, 17, 22-25, 27 og 43 straffes med bøde. Det samme gælder den, der er ansvarlig for, at et skib sejler under færøsk flag uden at være berettiget hertil.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes af landsstyret i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelser af forskrifterne.

Stk. 3. Er overtrædelserne begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar på-

sum so.

Stk. 4. Um so er, at onkur ber seg undan at lúka tær skyldurnar, sum á honum liggja at fremja skráseting ina, kann fortleypandi bót fyrisetast undir løgreglumálinum sum tvingsil at inna skylduna.

Stk. 5. Rættindi at hava ella fáa tjóðskaparbræv ella árit eftir § 19 kunnu av dómstólinum takast aftur fyri eitt av honum fyrisett tíðarskeið eftir reglunum í §§ 78 og 79 í borgarligu revsilógini.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lægges virksomheden som sådan.

Stk. 4. Hvis nogen modvilligt undlader at opfylde de ham påhvilende pligter til registreringens gennemførelse, kan der under politisagen fastsættes en fortløbende bøde som tvangsmiddel til gennemtvingelse af pligten.

Stk. 5. Retten til at have eller få udfærdiget nationalitetsbevis eller de i § 19 omhandlede påtegninger på nationalitetsbeviset kan inddrages for et af retten fastsat tidsrum efter de i borgerlig straffelov §§ 78 og 79 fastsatte regler."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar

Lógin um skráseting av skipum, løgtingslóg nr. 9 frá 15. mars 1970, er ikki broytt síðani hon kom í gildi.

Lógaruppskotið inniheldur m.a.:

1. Eina útgreining av ávísum reglum í lógini.
2. Ávísar ritstjórnarligar broytingar.
3. Broytingar orsakað av millumlanda sáttmálum.
4. Reglur um indekspantibrøv.
5. Nýggja orðing av revsireglum.

Verður lógin broytt sambært uppskotinum, er hon í samsvar við altjóða reglur. Hetta hevur serligan týdning, tá hugsað verður um, at uppskotið til Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum landsstýrið legði fram tann 5. desember 1991, í stóran mun vísir til reglurnar í lógini um skráseting av skipum.

Galdandi løgtingslóg um skráseting av skipum verður løgd við sum skjal (1) til lógaruppskotið.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1, nr. 1, nr. 8, nr. 10, nr. 15, nr. 22, nr. 24, nr. 26, nr. 27, nr. 30 og nr. 32: Broytingar av ritstjórnarligum ávum.

Til § 1, nr. 2: Við hesari orðingini av § 1 er ætlanin at útgreina treytirnar fyri, nær eitt skip skal verða mett sum føroyskt.

§ 1 í galdandi lóg um skráseting av skipum vísir, hvat viðvíkur tjóðskapartreytunum, til 1 í sjólógini. Hendan tilvísingin er ógreið, eftirsum § 1 í sjólógini setir treytirnar fyri, nær eitt skip skal verða mett sum danskt.

Avrit av § 1 í sjólógini verður lagt við sum skjal (2) til lógaruppskotið.

Skipaskráin hevur tulkað tilvísingina til § 1 í sjólógini soleiðis, at tað umframt treytina í § 1 í sjólógini um danskan ríkisborgararætt verður sett sum treyt, at persónurin hevur bústað í Føroyum, fyri at skipið kann verða mett sum føroyskt, og har sum tað verður kravt bústað í ríkinum, verður kravt bústað í Føroyum.

Uppskotið til orðing av § 1 lógarfestir hesa tulking.

Orðini "føroyingur" og "føroyingar" í uppskotinum skulu skiljast í samsvari við heimastýrislógina sum danskir ríkisborgarar við bústaði í Føroyum.

Skotið verður upp, at aðrar reglur í galdandi lóg um skráseting, sum vísa til § 1 í sjólógini verða broyttar, soleiðis at víst verður ístaðin til § 1 í lógini um skráseting av skipum.

Somuleiðis verður skotið upp, at heitini bruttoskrásetingartonsatal og bruttotons samsvara við galdandi altjóða reglur og aðra lóggávu innan sjóvinnu.

Broytingarnar í § 1, nr. 14, nr. 23 og nr. 25 eru avleiðingar av hesum.

Til § 1, nr. 3: Skotið verður upp, at orða regluna soleiðis, at hon er í samsvari við somu reglu í uppskotinum til løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá.

Til § 1, nr. 4, nr. 5, nr. 6 og nr. 7: Uppskotini til broytingar eru avleiðingar av, at Danmark, sum hini norðurlondini, hevur ratifiserað millumlandasáttmálan um skráseting av rættindum í skipum í gerð, sum varð samtyktur á 12. diplomatisku sjórættarráðstevnuni í Bruxelles í 1967.

Broytingarnar hava við sær, at skip, sum verða bygd á føroyskum skipasmiðjum, kunnu skrásetast í eini serligari deild í skipaskránni - skipabyggingarkráin - og at slík skráseting eisini skal kunna gerast av skipum, sum eru í gerð her í landinum fyri útlendska rokning. Tað verður sostatt ikki longur kravt, at eigarin av skipi í gerð skal lúka tjóðskapartreytirnar í § 1 í lógini.

Harumframt eru tonnaguheitini broytt, jbr. viðmerkingar til § 1, nr. 2.

Til § 1, nr. 8: Tilvísingin til 10 í sjólógini er broytt til § 1 í lógini um skráseting av skipum. Hetta skyldast partvíst broytingar í sjólógini, sum eru settar í gildi í Føroyum, og uppskotna orðingin av § 1 í lógini.

Til § 1, nr. 10: Broytingin í nr. 10 ásetir, at landsstýrinum verður heimilað eftir § 8 at áseta nærri reglur um fyrisiting av skipaskránni. Landsstýrið miðjar við

hesum ímóti at miðsavna alla sjóvinnuſyrisiting á einum staði uttanfyri Landsskrivstovuna til tess at skapa møguleika fyri sparingum á fíggjarlógini.

Til § 1, nr. 9, nr. 12, nr. 13, nr. 16, nr. 17, nr. 19, nr. 20 og nr. 21: Á framanfyri, undir viðmerkingunum, nevndu sjórættarráðstevnu í Bruxelles í 1967, varð somuleiðis samtykt ein millumlandasáttmáli um gerð av ávísum einsháttaðum reglum um sjópantirættindi og onnur pantirættindi í skipum.

Aftaná broyting í sjólógini við lóg nr. 205 frá 24. mai 1972 og samtíðuga broyting av lóg um skráseting av skipum (lóg nr. 205 og 206 frá 24. mai 1972) hevur Danmark ratifiserað millumlandasáttmálan.

Lóg nr. 205 frá 24. mai 1972 um broyting í sjólógini (serstakliga kapittul 11 í lógini um sjópantirættindi v. m.) er sett í gildi í Føroyum tann 11. oktober 1983.

Broytingarnar í lógini um skráseting av skipum m.a. um flyting av pantirættindum frá útlendskari skipaskrá til føroyska skipaskrá og um striking av skipi, sum broytingarnar í sjólógini høvdu sum fortreyt, eru tó ikki gjørdar í føroysku lógini um skráseting av skipum.

Uppskotið til orðing av §§ 7, 26, 29 v.m. inniheldur hesar broytingar.

Til § 1, nr. 18: Skipaskráin hevur haft ta praksis, at pantibrøv til statskassan, landskassan og teir lánistovnar, sum hesir hava sett á stovn, kunnu strikast móti kvittan. Hendan praksis er í samsvari við galdandi reglur í donsku lógini um skrásetning av skipum.

Sambært uppskotinum verður hendan praksis lógarfest.

Til § 1, nr. 28: Skotið verður upp, at reglan verður orðað samsvarandi somu reglu í donsku lógini um skráseting av skipum.

Til 1, nr. 29: Uppskotið lagar lógina um skráseting av skipum til lániavtalur, har tað er ásett, at høvuðsstólur og restskuld fylgir einum ávísum vísitali (indekspantibrøv).

Til § 1, nr. 31: Skotið verður upp, at reglan verður orðað í samsvari við somu reglu í donsku lógini um skráseting av skipum.

Til § 1, nr. 33: Skotið verður upp, at revsireglurnar verða orðaðar ørðvísi. M.a. verður ábyrgd fyri feløg tikin við.

Álit

í

Løgtingsmáli nr 78/1991: Broyting í løgtingslóg um skráseting av skipum.

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. februar 1992, og eftir 1. viðgerð tann 11. februar beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tað sæst, at broytingin, sum landsstýrið skjýtur upp, er í høvuðsheitum at orða lógina soleiðis, at hon kann vísast til sum eina

lóg um føroyingar og ikki fyri allar danskar ríkisborgarar, sum galdandi lóg ger við tað, at hon vísir til donsku sjólógina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Frank Davidsen, Vilhelm Johannesen, Lisbeth L. Petersen og Olaf Olsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við landsstýrinum og setir einki uppskot fram.

79. Um hækkingar í biltryggingargjøldum

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum at syrgja so fyri, at Tryggingarsamband Føroya, í sambandi við biltryggingarnar, yvirheldur løgtingslógina nr. 41 frá 27. mars 1990 um vinningssteðg § 1, stk. 2 til 3, og at Tryggingarsambandið Føroyar fær boð um beinanvegin at broyta prísirnar aftur til gomlu skipanina.

Viðmerkingar

Fyri jól fingu fleiri fólk eina jólaheilsan frá Tryggingarsambandinum. Saman við hesi jólaheilsan var ein kekkur. Upphæddirnar vóru ymiskar. Summi fingu kr. 150,00 og onkur annar kr. 200.00. Stutt eftir fingu tey rokningina, hækkingarnar, talan hevur verið um, liggja pluss 50% av tí, tey guldu frammanundan, meðan onnur skuldu gjalda út við 200% av tí, tey guldu frammanudan.

Síðani nýggju trygginartakstirnir fyri bilar komu í gildi, hava fleiri atfinningar verið at hoyrt, og flestu fók eru á einum máli um, at talan er um fullkomiliga órímiligar hækkingar.

Flestu bileigarar standa spyrjandi yvirfyri, hvussu komið verður til hesar takstir, sum mugu metast at vera sera órímiligir, og sum taka støðið undan fíggjarligu ætlanini hjá fólki..

Sambært løgtingslóg nr. 41 um vinningssteðg, er eingin ivi um, at Tryggingarsambandið Føroya hevur ikki heimild at hækka prísirnar. Vinningssteðgur varð galdandi frá 1. desember 1989 fyri øll vinnurekandi innan fiskna, handverk, handil, tænastu- og flutningsvirksemi. Sjálvsagt eisini innan tænasturna, sum eitur

trygging. Undir allari viðgerðini av hesum máli varð gjørt greitt, at ongar hækkingar skuldu verða uttan mun til umstøðurnar annars.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 79/1991: Um hækkingar í biltryggingargjøldum.

Málið er lagt fram av Sjálvstýrisflokkinum tann 6. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 11. februar 1992 beint til viðgerð í rættarnevndini.

Málið snýr seg um broyting í biltryggingarskipanini, og heldur uppskotsstillarin ikki, at nýggja skipanin er í tráð við løgtingslóg nr. 41 frá 27. mars 1990 um vinningsstcðg. Mælt verður tí til, at álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig í málinum. Nevndin hevur fingið skriv frá Føroya Arbeiðarafelag, Tryggingarsambandinum Føroyar og Felagnum fyri bilhandlarar og verkstaðaeigarum.

Rættarnevndin hevur eisini frá Tryggingareftirlitinum v/ D. J. Sørensen, Tórshavn, fingið løgfrøðiligt responsum, ið ber á sama borðið, sum uppskotið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og heldur við grundarlag í omanfyrinevnda responsum, at málið eigur at verða tikið upp beinanvegin.

Út frá hesum setir ein samd nevnd fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka málið um nýggja biltryggingarskipan til viðgerðar beinanvegin og í tí sambandi at kanna avleiðingarnar av løgfrøðiligum responsum dagf. 25. februar 1992 frá Tryggingareftirlitinum, ið er komið til tingið.

Landsstýrið boðar tinginum frá niðurstøðu sínari so skjótt sum møguligt.

80. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 við seinni broytingum samsýning landsstýrismanna verður gjørd henda broyting:

§§ 2, 3 og 4 verða strikaðar. §§ 5 - 8 verða hereftir §§ 2 - 5.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. mars 1992.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til landsstyremænd

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 5. august 1971 med senere ændringer om vederlag til landsstyresmænd foretages følgende ændring:

§§ 2, 3 og 4 udgår. §§ 5 - 8 bliver herefter §§ 2 - 5.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. marts 1992.

Viðmerkingar

Uppskot um broytingar í §§ 2, 3 og 4 snúgva seg um bíðilønina hjá landsstýrismonnum. Sí annars viðmerkingar í sambandi við løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

81. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 1976 við seinni broytingum um samsýning løgtingsmanna verða gjørdar hesar broytingar:

1) §§ 2, 3 og 4 verða strikaðar. §§ 5-8 verða hereftir §§ 2-5.
2) Í § 7, stk. 1 (nú § 4, stk. 1) ganga út orðini:
"bíðipeningurin eftir § 2".
3) Í § 7, stk. 2 (nú § 4, stk. 2) gongur út: "bíðipeningur".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. mars 1992.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til lagtingsmænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 51 af 9. maj 1976 med senere ændringer om vederlag til lagtingsmænd foretages følgende ændringer:

1) §§ 2, 3 og 4 udgår. §§ 5-8 bliver herefter §§ 2-5.
2) I § 7, stk. 1 (nu § 4, stk. 1) udgår:
"ventepenge elter § 2".
3) I § 7, stk. 2 (nu § 4, stk. 2) udgår:
"ventepenge".

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. marts 1992

Viðmerkingar

Hesi mál vóru framløgd av Sjálvstýrisflokkinum á tingi tann 24. januar 1990 - fyri tveimum árum síðani.

Fíggjarnevndin, sum viðgjørdi hesi mál segði í sínum áliti tann 25. mai 1990 soleiðis frá:

"Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at bíðipeningur landsstýris- og løgtingsmanna í ávísan mun er órímiligur, sum t.d. tá løgtingsmaður verður landsstýrismaður, og tá landsstýrismaður verður løgtingsmaður. Men her eins og í øðrum spurninguum hesum viðvíkjandi eru nógvar fyritreytir, sum mugu takast við í

eini heild, tá lógin verður broytt. Sum eitt dømi kann nevnast, at um løgtingsmaður eisini hevur annað alment arbeiði, og fær í boði at taka við sum landsstýrismaður, so fær hann munandi meira arbeiði og fær munandi minni løn.

Hetta og nógvir aðrir spurningar av sama slag arbeiða landsstýrið og fíggjarnevndin í felag við. Landsstýrið hevur longu nú gjørt kunngerð viðvíkjandi løn hjá løgtingsmonnum, sum eisini hava aðra almenna løn. Henda viðgerðin tekur langa tíð, og tí vilja Fíggjarnevndin og landsstýrið arbeiða víðari við hesum spurningi og koma við einum samlaðum uppskoti viðvíkjandi samsýning landsstýris- og løgtingsmanna."

Út frá hesum setti ein samd Fíggjarnevnd soljóðandi uppskot til samtyktar: "Landsstýrið og løgtingsins Fíggjarnevnd arbeiða við broytingum í løgtingslógum um samsýning til landsstýrismann og løgtingsmenn og leggur uppskot hesum viðvíkjandi fyri løgtingið í komandi tingsetu."

Uppskotini um broytingar hjá Sjálvstýrisflokkinum fullu, meðan uppskotið hjá Fíggjarnevndini varð samtykt við stórum meirluta. Síðani tá hava vit havt tvær ólavsøkutingsetur, og um fáar mánaðir byrjar tann triðja, uttan at broytiingar eru gjørdar í omanfyrinevndu lógum.

Hetta er eisini orsøkin til, at uppskotið verður framlagt av nýggjum, tí roknast má við, at sitandi samgonga eingi ynskir hevur um broytingar yvirhøvur, tað má metast at vera heilt órímiligt at bíða longur við fráboðaðu broytingunum, nú alt samfelagið er um at kollsigla á mongum økjum.

Lønarsamsýningarnar til løgtings- og landsstýrismenn síggja í dag umleið soleiðis út:

Landsstýrismannalønin:

landsstýrismaður	35/35.000 pr. mð.
løgtingsmaður/bíðipeningur	12/16.000 pr. mð.
avstaðargjald (skattafrítt)	0/13.000 pr. mð.
Tilsamans	47/64.000 pr. mð.

Løgtingsmannalønin:

løgtingsmaður	16/16.000 pr. mð.
bíðiløn sum landsstýrismaður	0/14.000 pr. mð.
form. í nevnd ella skrivari	0/ 6.000 pr. mð.
fundarpeningur	1/ 3.000 pr. mð.
avstðargjald (skattafrítt)	6/9.000 pr. mð.
annað alment starv	0/20.000 pr. mð.
Tilsamans	23/68.000 pr. mð.

Hesi viðurskifti eru ikki galdandi fyri verkafólk, sjófólk og fólk frá frítu vinnuni. Tey hava ikki alment starv at koma aftur til.

Men vert er at leggja til merkis, at lønin hjá hjúnafelaganum er ikki roknað uppí omanfyri standandi yvirliti.

Nógvar sparingar eru framdar á so at siga øllum økjum í samfelagnum, bæði hjá tí almenna og í privatu vinnuni, og tí undrar tað øll fólk í øllum samfelagnum, at lóggevararnir ikki ganga undan við góðum fyridømi og spara samfelagið fyri risauppheddir í lønarútreiðslunum.

Sum tað týðiliga sæst, sita m.a. samgongumenn fjálgir og tryggir á rókini og hava við slíkum lønum ongan møguleika at hugsa um vanlig fólk/ lønmóttakarar. Hjá teimum ger tað lftlan og ongan mun, at tollurin hækkar, at samhaldsfasti eftirlønargrunnurin er settur í verk, tvungin arbeiðsloysistrygging o.s. fr.

Hesin kravmentalitetur hjá lóggevarunum má halda uppat, og lønirnar mugu lækka til eitt rímiligt støði, so samsvar í størri mun fæst millum teir og fólkið annars.

Hetta er eisini orsøkin til, at Sjálvstýrisflokkurin mælir til, at bíðipeningurin til landsstýris- og løgtingsmenn verður settur til 0 krónur. Eftir fýra árum hevði talan verið um eina sparing upp á uml. 16 mió. krónur.

Spurningur er, hvat tað er, sum ger, at ávís fólk hava fingið ferðir so nógva løn sum tann vanligi lønmóttakarin? Svarið er heilt einfalt: Eingi!

Dagliga frættist frá fjølmiðlunum um, at íbúðarhús fara av knóranum, orsakað av skerdum inntøkumøguleikum, fólk flýggja av landinum undan m.a. almennum sparingum, og at vinnumøguleikarnir annars fækkast. Tær stóru lønirnar hjá lóggevarunum er ein háðan móti hesum fólkum.

Av tí at vit av royndum hava kunnleika um, at torført er at skerja samsýningarnar til lóggevararnar, (uppskot er sett fram um hetta áður), so er undirskrivarin sinnaður við hesum uppskotinum tí samtyktar at frásiga sær alla bíðiløn í framtíðini, um so er, at lógaruppskotið ikki verður samtykt.

I Uppskot

til

samtyktar

Løgtingsfólk samtykkja við hesum uppskotinum um at frásiga sær alla bíðiløn í framtíðini. Føroya Løgting áleggur landsstýrinum at syrgja fyri at sama verður galdandi fyri landsstýrismenn.

II Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at spardi peningurin í sambandi við bíðipening til landsstýris- og løgtingsmenn fer í grunn til arbeiðsskapandi tiltøk, og at sama upphædd tey komandi árini fer í grunn. Álagt verður landsstýrinum at gera eina reglugerð fyri grunnin og at leggja málið fyri løgtingið til góðkenningar.

III Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður formansskapinum á tingi at koma við einum yvirliti yvir allar formanslønir, samsýningar, fundarpening v.m. hjá øllum løgtingsnevndum.

Felagsálit

í

Løgtingsmáli nr. 80/1991: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna og 81/1991: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

Málini eru løgd fram av Lassa Klein, løgtingsmanni, 10. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 26. mars 1992 beind í Fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin vísir til skriv landsstýrisins dagf. 24. apríl 1992, sum er soljóðandi:

"Landsstýrið er farið í holt við at gera uppskot til nýggjar reglur um bíðipening landsstýris- og løgtingsmanna.

Uppskotið verður lagt fyri Fíggjarnevndina, tá landsstýrið er liðugt við viðgerðina.

Upplýsast kann, at prinsippið í tí nýggja uppskotinum er tað, at farið verður frá skipanini við bíðipeningi, men at løgtings- og landsstýrismenn í staðin forvinna sær eftirlønarrætt eftir, hvussu leingi teir hava sitið á løgtingi/ í landsstýri eftir somu prinsippum, sum tænastumenn vinna sær eftirlønarrætt."

Ein samd nevnd mælir tí til at bíða við málinum, til uppskot landsstýrisins fyriliggur.

Hetta hevur Jørgen Thomsen, fíggjarnevndarformaður, kunnað uppskotsstillaran, Lassa Klein um.

82. Stuðul til menning av fiskivinnuni á landi

Uppskot

til

Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnuni á landi.

Kapitul 1
Vørumenning

§ 1.

Heimilað verður landsstýrinum saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins í fíggjarárinum 1992 at nýta upp til 18 mió. kr. av játtanini til studning til fiskivinnuna í stuðuli til vørumenning á føroyskum fiskavirkjum. Hesin stuðul kann veitast til verkætlanir og marknaðarføring, herundir tíðaravmarkaðan stuðul fyri kg av framleiðsluni.

§ 2.

Stuðulin kann latast til verkætlanir, hvørs endamál er at menna nýggjar vørur og marknaðarføring av hesum, sum kunnu geva munabetri fkast til samfelagið.

Stk. 2. Stuðul kann latast einstøkum fiskavirki ella samtøku av fiskavirki og sølufyritøku.

§ 3.

Treytir fyri stuðuli er:

a) at virkið/samtøkan kann framlegg ja útgreinda frágreiðing um verkætlanina, tíðarætlan og meting um

Lagtingslov om støtte til udvikling af fiskerihverve på land.

Kapitel I
Produktudvikling

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til, sammen med lagtingets fiskeriudvalg, i finansåret 1992 at anvende op til 20 mio. kr. af bevillingen til støtte til fiskeriet, i støtte til produktudvikling på færøske fiskerivirksomheder. Støtten kan anvendes til produktudvikling og markedsføring, her iberegnet tidsbegrænset støtte pr. kg af produktionen.

§ 2.

Støtten kan gives til projekter, hvis formål er at udvikle nye produkter og markedsføring af disse, som kan give et fordelagtigt bidrag til samfundet.

Stk. 2. Støtten kan gives til enkelte fiskerivirksomheder eller til en sammenslutning af fiskerivirksomhed og salgsforetagende.

§ 3.

Betingelser for støtte er:

a) at virksomheden/sammenslutningen kan fremlægge en redegørelse over projektet, tidsplan og vurder-

kostnað og inntøkur og

b) at verkætlanin kann menna fiskavirkingini á landi yvirhøvur og gevur virðisøking til samfelagið.

§ 4.

Landsstýrinum saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins er heimil að at játta upp til 40% av kostnaðinum fyri verkætlanina.

Kapitul 2
Keyp av fiski frá útlondum.

§ 5.

Heimilað verður landsstýrinum saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins í fíggjarárinum 1992 at nýta upp til 5 mió. kr., av játtanini til studning til fiskivinnuna, í studningi til innflytara til keyp av fiski úr útlondum til virkingar í Føroyum.

Kapitul 3
Felagsreglur

§ 6.

Landsstýrið kann gera reglugerð fyri umsiting og útgjaldan av stuðuli. Henda reglugerð verður løgd fyri Fiskivinnunevnd Løgtingsins til góðkenningar.

§ 7.

Hendan lóg er galdandi fyri 1992.

Stk. 2. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 1991 um keyp av fiski frá útlondum til virkingar og løgtingslóg nr. 35 frá 7. mai 1991 um stuðul til vørumenning á føroyskum fiskavirkjum.

ing af omkostninger og indtægter og

b) at projektet overhovedet kan udvikle fiskeritilvirkningen på land, der skaber værdiforøgelse for samfundet.

§ 4.

Landsstyret sammen med lagtingets fiskeriudvalg bemyndiges til at give tilsagn om op til 1/2 af projektets omkostninger.

Kapitel 2
Køb af fisk fra udlandet.

§ 5.

Landsstyret bemyndiges til, sammen med lagtingets fiskeriudvalg, i finansåret 1992 at anvende op til 5 mio. kr. af bevillingen til støtte til fiskeriet, i støtte til importør til køb af fisk fra udlandet til produktion på Færøerne.

Kapitel 3
Fællesbestemmelser

§ 6.

Landsstyret kan fastsætte reglement for administration og udbetaling af støtte. Dette reglement forelægges lagtingets fiskeriudvalg til godkendelse.

§ 7.

Denne lov er gældende for 1992.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 34 fra 7. maj 1991 om køb af fisk i udlandet til produktion og lagtingslov nr. 35 fra 7. maj 1991 om støtte til produktudvikling på færøske fiskerivirksomheder.

Viðmerkingar

Politikkur landsstýrisins miðar ímóti at mest møguligt av føroyska tilfeinginum, bæði á landgrunninum og tað, ið verður veitt á fremmandum høvum og tað sum alivinnan framleiðir, skal útflytast sum liðugtvøra. Liðugtvøra er í hesum sambandi vøra, sum kemur til brúkaran uttan at annað framleiðslulið er ímillum. Útflutningur av hálvframleiddum vørum til aðrar at framleiða burturúr má sostatt halda uppat ella tálmast mest møguligt.

Síðsta vár samtykti løgtingið sokallaðu menningarlógina, har møguleikar eru at veita 1/3 í fløgustuðuli til umlegging av framleiðsluni úr hálvvirkaðari til liðugtvøru. Harafturat heimilar lógin at geva kilostuðul í ávísi tíðarskeið. Lógin hevur roynst væl.

Kilostuðulin, ið er veittur, er fyri úrdrátt úr laksi o.t. ásettur til ávísa krónuupphædd fyri ávíst tonsatal, og er betta rætti vegurin at ganga fyri slíkt tilfeingi, ið ikki fær stuðul í ráfiskaliðnum.

Viðvíkjandi kilostuðul til botnfiskasløg er hetta ikki so einfalt, so leingi vit eisini hava stuðul í rávøruliðnum. Sostatt má metast, at skulu vit menna um liðugtvøruframleiðsluna við hesi lóg, má roknast við, at kilostuðul má gevast í liðugtvøruliðnum, har framleitt verður úr botnfiskasløgum, so leingi stuðul verður givin í rávøruliðnum.

Nøgdin av liðugtvøru í 1991 roknast at vera ímillum 6.500 og 7.000 tons ímóti umleið 2.000 tonsum árið fyri. Metingar, sum landsstýrið og vinnan hava gjørt í felag, benda á at henda nøgd, um landsstýrið framhaldandi fíggjarliga er við til at hjálpa til eina strukturbroyting í vinnuni, kann koma uppá 10.000 - 12.000 tons í komandi ári.

Sum høvuðsregla kann sigast, at liðugtvørur í mintasta lagi geva dupult so nógv arbeiði pr. kilo sum hálvvirkað vøra, sum t.d. blokkur.

Tilmælt verður at halda fram við skipanini komandi ár og játta 18 mió. kr. Harafturat eigur møguleikin fyri at geva beinleiðis stuðul til fløguna at hækka frá 1/3 upp í 40%, og hevur hetta serstakar grundir, tá ið talan verður um at menna vørur úr saltaðari framleiðslu.

Viðvíkjandi keyp av fiski úr útlondum til virkingar, var landskassin við at fíggja keyp av rættiliga munandi nøgd av fiski til virkingar. Talan var um eini 5.000 tons, bæði frýst og fekst.

Henda royndi gav avlop hjá nøkrum virkjum, men hall hjá øðrum, men sum heild má sigast, at royndin var positiv landsbúskaparliga, serliga við atliti til, hvussu arbeiðsstøðan í landinum er.

Ein bági fyri hetta fiskakeyp er 3. lands trupulleikarnir við EØC, men hóast hetta metir vinnan, at tað verður møguligt og neyðugt at keypa ávísa nøgd eisini í hesum árinum, og selja hana uttanfyri EØC. Tí metir landsstýrið tað vera rætt at

avseta pening á fíggjarlógini, soleiðis at landið kann medvirka í slíkum keypum, um hetta er samfelagsliga gagnligt. Nevnast kann, at búskaparráðið sigur í eini niðurstøðu, at í tí støðu, sum Føroyar eru í í dag, so geva stórt sæð allar aðrar alternativar nýtslur av tilfeinginum helst minni ískoyti til bruttofaktor enn keyp av fiski úr útlondunum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 82/1991: Stuðul til menning av fiskivinnuni á landi.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. februar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 25. februar 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Síðani málið var til 1. viðgerð, hevur nógv verið umrøtt at umleggja stuðulin til fiskivinnuna, so at so lítið sum gjørligt er kilostudningur av tí, at hann verður roknaður sum kappingaravlagandi.

Eisini hevur nevnd arbeitt við, hvussu tað sá fíggjarliga út. við at keypa fisk úr útlondum til virkingar í Føroyum, og kom tann nevndin til ta niðurstøðu at eitt lítið skiftisavlop kann fáast við at virka innfluttan fisk.

Nú arbeiðsloysið er vorðið so stórt í landinum, og útlit eru til, at tað alsamt fer at vaksa, um ikki nakað heilt munandi hendir, sum kann bøta um virksemið, so metir nevndin, at rætt kann vera at stuðla hesa vinnu fyri at skapa arbeiðspláss í landinum.

Av kønum monnum verður mett, at um 14 ársverk kunnu fáast burtur úr 1.000 tonsum av ráfiski, sum verða innflutt til virkingar, sum svarar til umleið 2,2 mió. kr. í arbeiðsløn. Um skatturin er um 36%, so svarar tað til um 800.000 kr. av at virka 1.000 tons. Tað er betri at hava 14 fók í arbeiði, sjálvt um eingin skattur fæst í landskassan av inntøkuni hjá teimum, enn at veita arbeiðsloysishjálp ella - trygging til tey, og harvið fáa hvørki virksemi ella annan vinning.

Til menning og líknandi kann tað eisini vera forsvarligt at veita um 200.000 kr. fyri hvøji 1.000 tons av rávøru.

Út frá hesum setir tí ein samd nevnd í staðin fyri uppskot landsstýrisins so ljóðandi:

uppskot

til

Løgtingslóg um stuðul til arbeiðsskapandi tiltøk innan fiskivinnuna á landi.

Lagtingslov om støtte til arbejdsskabende foranstaltninger af fiskerierhverv et på land.

Kaptul 1
Keyp av fiski úr útlondum.

§ 1.

Heimilað verður landsstýrinum at játta eftir umsókn frá fiskavirkjum upp til kr. 72.000,- fyri hvørt ársverk, sum innfluttur fiskur til virkingar gevur. Tó kann ongantíð játtast meira enn kr. 100.000, - fyri hvørji 100 tons av fiski, sum innflutt verða.

§ 2.

Fyri at kunna fáa stuðul eftir hesi lóg krevst, at virkið upplýsir

1. Navn og heimstað.
2. Hvørjum landi fiskurin er innfluttur úr.
3. Hvat fiskaslagið er.
4. Hvussu fiskurin er hagreiddur (t.d. kruvdur við høvdi og frystur).
5. Hvussu stór nøgdin er og kvittan fyri keypið.
6. Hvussu mong ársverk nøgdin gevur av at virka hana.
7. Hvørja upphædd søkt verður um.

Kapitul 2
Vørumenning

§ 3.

Heimilað verður landsstýrinum saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins í fígg-

Kapitel 1
Køb af fisk fra udlandet.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til efter ansøgning fra fiskerivirksomheder at bevilge hver årsproduktion, som importeret fisk til forarbejdning giver. Der kan dog aldrig bevilgess mere end kr. 100.000, for hver 100 tons af fisk, som bliver importeret.

§ 2.

For at få støtte efter denne lov kræves at virksomheden oplyser

1. Navn og hjemsted.
2. Fra hvilket land, fisken er importeret.
3. Arten af fisk.
4. Hvorledes fisken er behandlet (d.v.s. opskåret med hoved og frossen).
5. Hvor stor mængden er og kvittering for beløbet.
6. Hvor mange årsproduktioner giver at producere denne.
7. Hvilden beløbsstørrelse der er søgt om.

Kapitel 2
Produktudvikling

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til sammen med Lagtingets Fiskeriudvalg i finans-

jarárinum 1992 at veita stuðul til vøru menning á føroyskum fiskavirkjum. Hesin stuðul kann veitast til verkætlanir og marknaðarføring, herundir tíðaravmarkaðan stuðul.

§ 4.

Stuðulin kann latast til verkætlanir, hvørs endamál er at menna nýggjar vørur og marknaðarføring av hesum, sum kunnu geva munabetri ídkast til samfelagið.

Stk. 2. Stuðul kann latast einstøkum fiskavirki ella samtøku av fiskavirki og sølufyritøku.

§ 5.

Treytin fyri stuðli er:

1) at virkið/samtøkan kann framleggja útgreinda frágreiðing um verkætlanina, tíðarætlan og meting um kostnað og inntøkur og

b) at verkætlanin kann menna fiskavirkingina á landi yvirhøvur og hevur virðisøking til samfelagið.

§ 6.

Landsstýrinum saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins er heimilað at játta upp til 40% av kostnaðinum fyri verkætlanina.

§ 7.

Í stuðuli eftir hesari lóg kann í mesta lagi játtast tilsamans 23 mió. kr. í fíggjarárinum 1992 og verður at taka av játtanini: Studningur til fiskivinnuna.

året 1992 at yde støtte til produktudvikling på færøske fiskerivirksomheder. Støtten kan anvendes til produktudvikling og markedsføring, iberegnet tidsafgrænset støtte.

§ 4.

Støtten kan gives til projekter, hvis formål det er at udvikle nye produkter og markedsføring af disse, som kan give et fordelagtigt bidrag til samfundet.

Stk. 2. Støtte kan gives til enkelte fiskerivirksomheder eller til en sammenslutning af fiskerivirksomhed og salgsforetagende.

§ 5.

Betingelsen for støtte er:

a) at virksomheden/ sammenslutningen kan fremlægge en redegørelse over projektet, tidsplan og vurdering af omkostninger og indtægter og

b) at projektet overhovedet kan udvikle fiskeritilvirkningen på land, der skaber værdiforøgelse for samfundet.

§ 6.

Landsstyret sammen med Lagtingets Fiskeriudvalg bemyndiges til at give tilsagn på op til 40% af projektets omkostninger.

§ 7.

Støtte efter denne lov kan højst bevilges med ialt 23 mio. kr. i finansåret 1992 og tages af bevillingen: Støtte til fiskerierhvervet.

§ 8.

Stuðul kann veitast eftir hesi lóg fyri álmanakkaárið 1992.

§ 9.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 8.

Støtte kan efter denne lov ydes for kalenderåret 1992.

§ 9.

Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort.

83. Skatting av hjúnum við helvtarbýti

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum skjótast gjørligt at fyrireika og leggja fyri løgtingið uppskot um broyting í skattalógini, soleiðis at heimaboyrandi hjúnafelagin verður skattaður við helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Viðmerkingar

Landsstýrið 1985-1988 arbeiddi nógv við familjupolitiskum spurningum, og støkilig úrslit spurdust burturúr sum lógirnar um barsilsorlov, barnastyrk o. a.

Hesini varð arbeitt nógv við spurningunum um at skatta hjún við helvtarbýti.

Kanningar vórðu tá gjørdar, og Likningarráðið metti, at tílík skattaskipan ávirkaði inntøkurnar hjá landskassanum og hjá kommununum, og teir komu fram til eitt tal sum 36 mió. kr., sum fóru at koma minni inn í skatti.

Kreppa hevur rakt samfelag okkara síðan tá, og arbeiðsloysið er alsamt vaksandi, soleiðis at talið á teimum, ið fáa forsorgarhjálp vegna arbeiðsloysi, nú er komið upp um 1000 persónar um mánaðin.

Í tílíkum tíðum er tað av allrastørsta týdningi, at heimini verða stuðlað, og familjan stendur saman. Tað gongur út yvir familjuna og uppalingina, at arbeiðið við hús verður ikki mett, sum tað eigur at vera, og stuðlað. Lóggávan tykist alt meir og meir hava gingið ímóti hesum arbeiði.

Í grannalondum okkara verður tað óløuta arbeiðið, ið gjørt verður m.a. heima við hús, talt upp í bruttotjóðarúrtøkuna við heilum 37,5%.

Lóg um at skatta hjún við helvtarbýti kundi gjørt tað, at arbeiðsloysið minkar, um hjún verða før fyri at liva av einari inntøku, sum í dag noyðast at hava tvær. Í hesum tíðum er tað neyðugt at býta tað arbeiði, sum er, so at øll fáa nakað.

Heimini eru grundstuðulin í samfelagnum og smáar borgir, ið verja hin einstaka. Tí sigur ST-samtyktin um mannarættindi, § 16, 3. stk.:

"Familjan er hin náttúrligi og grundleggjandi eindarbólkurin í samfelagnum og hevur tí krav upp á verju samfelagsins og ríkisins."

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 83/1991: Skatting av hjúnum við helvtarbýti.

Málið er lagt fram av Kristiligu Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 11. februar 1992 og undir 1. viðgerð 20. mars 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í fíggjarmálum. Landsstýrismaðurin upplýsti fyri nevndini, at arbeitt verður við lógaruppskoti, sum í fyrstu atløgu skapar grundarlag fyri, at hjún verða skattað hvør sær, og at hetta uppskot verður lagt fram í ólavsøkutingsetuni 1992.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Út frá upplýsingunum frá landsstýrinum heldur meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) onga orsøk vera til at samtykkja uppskotið frá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroyar Framburðs- og Fiskivinnuflokki nú, men mælir til at bíða eftir uppskotinum frá landsstýrinum.

Minnilutin (Finnbogi Arge) sigur, at oyrabóndin málbar seg soleiðis, tá Orvur bóndi hevði borðreitt fyri honum á Skála, at "tungt er at eta sítt egið - og tað stolið".

Men tingmanning Sambandsfloksins heldur ikki, at tað ger so nógv, at aðrir flokkar á tingi leggja fram somu uppskot, sum Sambandflokkurin hevur átt. Tvørturímóti, tí flokkurin fegnast um, at sjónarmiðini vinna frama og at undirtøkan veksur.

Støða Sambandsfloksins er, at heimaarbeiðandi hjúnarfelagi eigur at verða skattaður við helvtini av inntøkuni, tó skal hetta avmarkast til í mesta lagi eina vanliga ársløn hjá tí ófaklærda. Slík skipan ger tað møguligt hjá fólki at arbeiða heima, og kann sostatt verða við til at økja um talið av arbeiðsplássum í samfelagnum.

Sambandsflokkurin úsannar tó, at slík umlegging er kostnaðarmikil og krevur nógva orku í skattafyrisitingini. Roknast kann við, at skattainntøka landsins

hevði minkað við umleið 40 mió. kr. árliga, um uppskotið varð veruleiki. Hetta er búskaparliga ikki forsvarligt í løtuni, og mælir minnilutin tí tinginum til at fella uppskotið.

84. Løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka

Uppskot

til

Løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.

Kapittul 1.

Lógarøkið, framleiðsla og innflutningur.

§ 1.

Sum rúsdrekka eftir hesi lóg er at skilja allur løgur, sum hevur minst 2 1/4 vektprosent av alkoholi í sær.

Stk. 2. Sum rúsdrekka verður ikki roknað:

1) Løgur sum ikki er drekkiligur, og bert ætlaður til tekniska nýtslu ella kropsrøkt.
2) Heilivágur sum bert er loyvdur apotekum at selja eftir apotekaralóggávuni.

Stk. 3. Tjaldurs Apotekið hevur einkarrætt til innflutning av denaturerаðum spritti og spritti til tekniska nýtslu. Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um sølu av spritti.

§ 2.

Tað er ikki loyvt

1) at bryggja ella framleiða rúsdrekka ella

Lagtingslov om indførsel og salg af berusende drikke.

Kapitel 1.

Lovens område, produktion og import.

§ 1.

Ved berusende drikke efter denne lov forstås alle vædsker, der indeholder mindst 2 1/4 vægtprocent alkohol.

Stk. 2. Som berusende drikke regnes ikke:

1) Vædsker der ikke er drikkelige, og kun er beregnet til teknisk brug eller til legemspleje.
2) Medicin som kun apotker har tilladelse til at sælge i henhold til apotekslovgivningen.

Stk. 3. Tjaldurs Apotek har eneret til import af denatureret sprit og sprit til teknisk brug. Landsstyret fastsætte ved bekendtgørlse nærmere bestemmelser om salg af sprit.

§ 2.

Det er ikke tilladt

1) at brygge eller fremstille spiritus eller

2) at gera drekkandi tílíkar vørur sum innihalda alkohol, sum gjørdar eru ódrekkiligar.

Stk. 2. Landsstýrinum er tó heimilað at geva bryggjarúm loyvi at bryggja sterkt øl, sum í sær hevur hægst 4,6 vektprosent av alkoholi.

Stk. 3. Landsstýrið ásetir í loyvinum nærri reglur um eftirlit við framleiðsluni av sterkum øli.

§ 3.

Einkarrætt til innflutning av rúsdrekka hevur stovnur, nevndur "Rúsdrekkasøla Landsins".

Stk. 2. Landsstýrinum er heimilað at áseta í hvønn mun ferðandi, sum koma til Føroya við skipi og flogfari, kunnu taka við sær rúsdrekka.

Stk. 3. Tað er ikki loyvt at innflyta øl, sum í sær hevur meira enn 4,6 vektprosent av alkoholi.

Kapittul 2
Søla og útflýggjan.

§ 4.

Einkarrætt at selja rúsdrekka hevur Rúsdrekkasøla Landsins.

Stk. 2. Rúsdrekkasøla Landsins kann eftir reglunum, sum landsstýrið ásetir, loyva føroysku bryggjarúnum at út-flýggja egna framleiðslu.

Stk. 3. Undantikin frá stk. 1 eru persónar og feløg, sum hava fingið loyvi til at skeinkja rúsdrekka eftir kap. 3 í hesi lóg.

Stk. 4. Feløg, ið selja rúsdrekka til limirnar, koma eisini undir reglurnar í hesi lóg. Tóikki feløg, ið einans hava ársveitslur ella líknandi stakar veitslur fyri

2) at gøre drikkende sådanne varer, der indeholder alkohol, og som er gjort udrikkelige.

Stk. 2. Landsstyret er dog bemyndiget til at give bryggerier tilladelse til at brygge og sælge stærkt øl, som indeholder højst 4,6 vægtprocent alkohol.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter i tilladelsen de nærmere bestemmelser om kontrol med produktionen af stærkt øl.

§ 3.

Eneret til import af spiritus har en institution, nævnt "Rúsdrekkasøla Landsins".

Stk. 2. Landsstyret er bemyndiget til at fastsætte i hvilket omfang rejsende, der ankomer til Færøerne med skib eller fly, kan medbringe spiritus.

Stk. 3. Det er ikki tilladt at importere øl, sum indeholder mere end 4,6 vægtprosent alkohol.

Kapitel 2.
Salg og udlevering.

§ 4.

Eneret til at sælge berusende drikke har "Rúsdrekkasøla Landsins".

Stk. 2. "Rúsdrekkasøla Landsins" kan i henhold til bestemmelser fastsat af landsstyret give de færøske bryggerier tilladelse til at udlevere egen produktion.

Stk. 3. Undtaget fra stk. 1 er personer og selskaber/foreninger, der har fået tilladelse til at serverer berusende drikke efter kap. 3 i denne lov.

Stk. 4. Selskaber/foreninger, der sælger berusende drikke til medlemmerne, er omfattet af bestemmelserne i denne lov. Dog ikke selskabet/foreninger, der

limunum.

§ 5.

Søla og útflýggjan av rúsdrekka til persónar undir 18 ár er ikki loyvd.

Stk. 2. Útflýggjarin hevur skyldu at tryggja sær, at móttakarin lýkur aldurstreytina.

§ 6.

Landsstýrið ásetir nærri reglur um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins.

Kapittul 3
Útskeinking

§ 7.

Loyvisnevndin kann geva persónum og feløgum, sum reka hotel- og restaurationsvirksemi loyvi til at skeinkja gestunum rúsdrekka. Loyvið er galdandi 4 ár um ferðina.

Stk. 2. Áðrenn loyvi verður givið, skal ummæli vera fingið frá myndugleikunum á staðnum.

Stk. 3. Tá støða skal takast til, um loyvi skal veitast ella ikki, skal nevndin m.a. hava í huga viðurskifti umsøkjarans, hølisviðurskiftini, tal av loyvum í økinum og umhvørvið.

Stk. 4. Avgerðir, ið loyvisnevndin tekur, kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 8.

Loyvisnevndin hevur 7 limir. Landsstýrið velur 6 limir fyri løgtingsvalskeiðið, harímillum formannin. 7. limurin er landfútin.

kun har årsfester eller lignende enkelte fester for medlemmerne.

§ 5.

Salg og udlevering af berusende drikke til personer under 18 år er forbudt.

Stk. 2. Den der foretager udlevering har pligt til at sikre sig, at modtageren opfylder alderesbetingelsen.

§ 6.

Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om organisation og drift af "Rúsdrekkasølu Landsins".

Kapitel 3
Udskænkning

§ 7.

Bevillingsnævnet kan give personer og selskaber/foreninger tilladelse til erhvervsmæssige at udskænke berusende drikke til gæsterne. Tilladelsen er gældende for 4 år ad gangen.

Stk. 2. Inden en tilladelse meddeles, skal der indhentes udtalelse fra myndighederne på stedet.

Stk. 3. Når der tages stilling til, om en tilladelse skal gives eller ikke, skal nævnet tage i betragtning bl.a. ansøgningernes forhold, lokalforholdene, antal af tilladelser i området og miljøet.

Stk. 4. Bevillingsnævnets afgørelser kan ikke indankes for højere administrativ myndighed.

§ 8.

Bevillingsnævnet har 7 medlemmer. Landsstyret vælger 6 medlemmer for lagtingets valgperiode, herunder formanden. Den 7. medlem er landfogeden.

§ 9.

Fyri at ein persónur kann fáa útskeinkingarloyvi, krevst at hesin,

1) hevur fylt 25 ár, og ikki er gjørdur ómyndugur,
2) hevur danskan heimarætt,
3) hevur bústað í Føroyum og
4) ikki hevur víst tílíka atferð, at orsøk er at halda, at hann ikki fer at reka virksemið forsvarliga.

Stk. 2. Verður útskeinkingarloyvi veitt einum felag, skal ein persónur, sum lýkur treytirnar í stk. 1 hava ábyrgd av, at galdandi reglur og treytir verða bildnar.

§ 10.

Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um útskeinking av rúsdrekka, herundir um gjald fyri útskeinkingarloyvir.

§ 11.

Hevur loyvishavari brotið reglurnar í hesi lóg, reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella treytirnar í loyvinum, kann loyvisnevndin taka loyvið aftur. Sama er, um virksemið verður rikið á slíkan hátt, at tað elvir til drykkjuskap ella tevsiverdar gerðir, og løgreglan frammanundan hevur ávarað loyvishavaran.

§ 12.

Á støðum við útskeinkingarloyvi er tað forboðið at skeinkja rúsdrekka til persónar, sum

1) ikki eru fyltir 18 ár,

§ 9.

For at en person kan få tilladelse til udskænkning, er det en betingelse at denne

1) er fyldt 25 år, og ikke er umyndiggjort,
2) har dansk indfødsret,
3) har bopæl på Færøerne og
4) ikke har udvist sådan adfærd, at der er grund til at antage, at han ikke vil drive virksomheden på forsvarlig måde.

Stk. 2. Hvis en udskænkningstilladelse gives til et selskab/forening, skal en person, der opfylder betingelserne i stk. 1 have ansvaret for, at gældende bestemmelser og betingelser overholdes.

§ 10.

Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere bestemmelser om udskænkning af berusende drikke, herunder om betaling for udskænkningstilladelser.

§ 11.

Har bevillingshaveren overtrådt bestemmelserne i denne lov, bestemmelser fastsat med hjemmel i denne lov eller betingelserne i tilladelsen. Det samme gælder, hvis virksomheden drives på en sådan måde, at den forårsager drukkenskab eller strafbare handlinger og politiet i forvejen har advaret bevillingshaveren.

§ 12.

På steder med bevillingstilladelse er det forbudt at udskænke berusende drikke til personer, der

1) ikke er fyldt 18 år,

2) við almennari skipan eru undir avvenjingarviðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, ella
3) tá orsøk er at halda, at teir við at drekka meira kunnu verða sær sjálvum til vanda ella verða ørðum til vanda ella ónáðir.

Stk. 2. Á støðum við útskeinkingarloyvi, hevur loyvsihavarin skyldu til á sjónskum stað at sláa upp, at tað er forboðið at skeinkja rúsdrekka til persónar undir 18 ár.

Stk. 3. Er nakar vorðin fullur skal loyvishavarin ella tann, sum er í hansara stað, taka sær av, at tann fulli undir tryggum umstøðum verður fingin til hús ella á løgreglustøðina ella boðsenda løgreglumi.

Stk. 4. Á støðum við útskeinkingarloyvi, hevur loyvishavarin skyldu at ansa eftir, at tað eisini ber til at fáa annað at drekka, sum ikki er rúsandi. Tað skal framganga av prísslistum, vínkorti ella lætt lesiligum uppslagi at tílíkt drekka fæst.

Stk. 5. Til at útskeinkja rúsdrekka mugu ikki setast fólk undir 18 ár, við undantak av kokka- og tænaralærlingum við sáttmála.

Kapittul 4
Almennar ásetingar

§ 13.

Í almenntum restauratións- ella dansihølum er tað forboðið gestunum at njóta rúsdrekka, sum teir hava við sær. Á sjónskum staði í hølunum skal vera sligið upp, at hetta ikki er loyvt.

2) ved det offentliges foranstaltning er under afvænningsbehandling for spiritusmisbrug, eller
3) om hvem der er grund til at antage, at de ved yderligere spiritusnydelse kan give anledning til fare for sig selv eller fare eller ulempe for andre.

Stk. 2. På steder med udskænkningstilladelse, har bevillingshaveren pligt til på et iøjnefaldene sted at anbringe opslag om, at det er forbudt at udskænke berusende drikke for personer under 18 år.

Stk. 3. Når nogen er blevet beruset, skal bevilligshaveren eller dennes stedfortræder drage omsorg for, at den berusede under betryggende omstændigheder bringes hjem eller til en politistation, eller tilkalde politiet.

Stk. 4. På steder med udskænkningstilladelse har bevillingshaveren pligt til at drage omsorg for, at der også er mulighed for at få serveret alkoholfrie drikke. Det skal fremgå af prislister, vinkort eller klart læselige opslag, at sådanne drikke føres.

Stk. 5. Til udskænkning af berusende drikke må der ikke ansætts personer under 18 år, med undtagelse af kokke- og tjenerlærlinge med kontrakt.

Kapitel 4
Særlige bestemmelser

§ 13.

I offentlige restaurations- eller danselokaler er det forbudt gæsterne at nyde medbragt berusende drikke. På iøjnefaldende sted i lokalet, skal findes opsläet, at dette ikke er tilladt.

§ 14.

Øll reklama í føroyskum fjølmiðlum og tíðarritum, útbýting av reklameseðlum o.t. viðvíkjandi sølu og útflýgging av rúsdrekka, er forboðin.

Kapittul 5
Revsing

§ 15.

Brot móti reglunum í § 2, stk. 1, §§ 3 - 5 og § 12 - 14 ella reglum ásettar við heimild í lógini ella treytum í loyvinum verður revsað við bót, hefti ella fongsul upp í eitt ár, um so er, at lóggávan annars ikki ásetir strangari revsing.

Stk. 2. Hevur eitt partafelag, lutafelag ella tílíkt framt brotið, kann sekt verða áløgd felagnum.

Stk. 3. Málini verða viðgjørd sum løgreglumál. Rættarmeðalin í rættargangslógarinnar kapitlum um at leggja hald á og rannsókn kunnu tó nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

Kapittul 6.
Gildisásetingar

§ 16.

Landsstýrið ásetir í kunngerð, nær lógin fær gildi í síni heild ella í pørtum.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 115 frá 4. apríl 1928 "for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke v.m." við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 61 frá 19. mars 1980 um skamtan av rúsdrekka við seinni broyting og løgtingslóg nr. 35 frá 18.

§ 14.

Al reklame i de færøske massemedier og tidsskrifter, uddeling af reklamesedler o.s. vedrørende salg og udlevering af berusende drikke, er forbudt.

Kapitel 5
Straf

§ 15.

Overtrædelse af bestemmelserne i § 2, stk. 1, §§ 3 - 5 og §§ 12 - 14 eller bestemmelser fortsat med hjemmel i loven eller betingelser i tilladelsen straffes med bøde, hæfte eller fængsel op til et år medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning.

Stk. 2. For overtrædelse, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

Stk. 3. Sagerne behandles som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitler om beslaglæggelse og ransagning finder dog anvendelse i samme omfang som i statsadvokatsager.

Kapitel 6.
Ikrafttrædelsesbestemmelser

§ 16.

Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse tidspunktet for lovens ikrafttræden i sin helhed eller i dele.

Stk. 2. Samtidig ophæves lov nr. 115 af 4. april 1928 for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke mv. med senere ændringer, lagtingslov nr. 61 af 19. marts 1980 om rationering af spiritus med senere ændring og lagtingslov nr. 35 af 18. no

november 1954 um innflutning av denatureraðum spritti.

Stk. 3. Kunngerðir sum eru givnar eftir higartil galdandi skipan, vera í gildi til tær verða settar úr gildi við reglum sambært hesi lóg.

Stk. 4. Til lógin kemur í gildi í sínt heild, fær landsstýrið heimild til at veita persónum og felløgum, sum koma undir ásetingarnar í kap. 3. serloyvi til innflutning og keyp av rúsdrekka.

vember 1954 om indførsel af denatureret sprit.

Stk. 3. Bekendtgørelser udstedt i henhold til hidtil gældende ordning, forbliver i kraft, indtil de ophæves af regler, fastsat med hjemmel i denne lov.

Stk. 4. Til loven træder i kraft i sin helhed, er landsstyret bemyndiget til at give personer og selskaber/foreninger der bliver omfattet af bestemmelsrne i kap. 3. ekstrabevilling til import og køb af berusende drikke.

Viðmerkingar:

Endamálið við hesum lógaruppskoti, sum landsstýrið leggur fram, er mest møguligt at minka um teir skaðar, sum nýtslan av rúsdrekka hevur við sær fyri einstaklingar og fyri samfelagið og at fáa greiðar reglur í sambandi við rúsdrekkaviðurskiftini í Føroyum.

Uppskot til broytingar í rúsdrekkalóggávuni hava ofta verið fyri á tingi, og einar tríggjar ferðir hava uppskot um einkarinnflutning og einkarsølu verið framm, men eingi av hesum eru framd.

Ymsar broytingar eru tó millum ár og dag gjørdar í sambandi við rúsdrekkaviðurskiftini í Føroyum.

Ymsar broytingar eru tó millum ár og dag gjørdar í sambandi við rúsdrekkaskipan okkara. Flestar hava havt sum mál at avmarka rýtsluna og gera tað truplari at fáa fatur á rúsdrekka. Men gongdin hevur í veruleikanum verið ein onnur.

Ásannast má, at skilið er vánaligt á hesum økinum í dag.

Rúsdrekkalóggávan er avlagað, tambað og toygd av bæði einstaklingum og myndugleikum, og tí er hon torfør ella rættari ógjørlig at umsita.

Tað, sum fer fram í dag í sambandi við rúsdrekka er ógvuliga óheppið fyri rættarhugsanina við tað, at tær lógir og reglugerðir, vit hava, ikki verða hildnar.

Lógin, sum upprunaliga var ætlað at vera avmarkandi, virkar í dag beint øvugt. Hon hevur við sær óhepnar drykkjuvanar og hevur ført til ábyrgdarloysi í sambandi við rúsdrekkanýtslu.

Tað er landsstýrisins støða, at vit mugu hava lóg og skipan í sambandi við rúsdrekkanýtslu, sum lúskar til okkara tíð og samfelag, og sum tað ber til at halda, umsita og hava eftirlit við.

Eisini er tað landsstýrisins støða, at neyðugt er at reka miðvísan og virknan politikk á hesum økinum, og fyrsta fyritreytin er at lógargrundarlagið er í lagi.

Tað er ætlan landsstýrisins at farast skal undir upplýsandi og fyribyrgjandi virksemi í sambandi við rúsdrekka.

Verður henda lóg samtykt, fer landsstýrið at fylgja gjølla við hvørjar avleiðingar hon fær. Um nýggja skipanin vísir seg at hava óhepnar fylgjur, verða neyðugar broytingar í lóg og reglugerðum gjørdar beinanvegin.

Lógaruppskotið, sum her verður lagt fram, hevur við sær hesar høvuðsbroytingar í mun til tær lógir, vit nú hava:

1. Einkarinnflutningur
2. Einkarsøla
3. Avtøku av skamtanarkortinum
4. Broyting í aldursmarkinum
5. Loyvi til útskeinking

ad. 1. Allur innflutningur av rúsdrekka skal ganga gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins. Slík skipan gevur møguleikar fyri at reka fyribyrgjandi politikk, m. a. við at eftirlitsmøguleikarnir verða betri.

ad. 2. Einkarsølan forðar fyri, at vit fáa rúsdrekkahandlar á hvørjum horni, gevur betri møguleikar fyri eftirliti, og ger at tað ber til at fáa eina varna gongd við at kunna keypa rúsdrekka í landinum. Raksturin av Rúsdrekkasølu Landsins skal hvíla í sær sjálvum, umframt at peningur skal nýtast til fyribyrging og upplýsing.

ad. 3. Í lógaruppskotinum er skipanin við skamtanarkorti ikki tikin við. Orsøkin er, at henda skipan í dag ikki virkar skamtandi, tí tað vísir seg, at um skamtanarkortið ikki nøkkur til, ber altíð til at fáa so mikið rúsdrekka, sum tørvur er á.

ad. 4. Aldursmarkið at keypa rúsdrekka verður broytt til 18 ár, tí í dag eru 18 ára gomul myndug í øllum viðurskiftum.

ad. 5. Í nógv ár hevur verið tosað um at byggja upp eina restauratiónsvinnu í Føroyum, og er galdandi rúsdrekkaskipan ein av trupulleikunum hendan vinnan hevur. Eisini í sambandi við eina menning av ferðatólkavinnuni er vist á, at broytingar mugu gerast við loyvum til útskeinking.

Landsstýrið ásannar, at tørvur er á eini lóg um restauratiónsvirksemi. Farið verður undir at gera uppskot til slíka lóg.

Landsstýrið hevur í sambandi við fyrireikingarnar til hetta lógaruppskot, tosað við tey, sum kunnu hugsast at hava áhuga í málinum. Nevnast skal løgreglan, tey ið reka hotel- og restauratiónsvirksemi, bryggjarfini, avhaldsrørðsluna og Rúsdrekka- og Narkotikaráðið.

Hjálagt er skriv frá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum.

Viðmerkjast skal, at fyriliggjandi lógaruppskot er broytt í mun til tað Rúsdrekka- og Narkotikaráðið hevur viðgjørt. Flestu broytingarnar eru í samsvar við uppskotini frá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum.

Sambært lógaruppskotinum skal landsstýrið gera ymsar kunngerðir, m.a. reglur fyri raksturin av rúsdrekkasøluni, sølu av útskeinking, og í hesum sambandi verður Rúsdrekka- og Narkotikaráðið tikið við uppá ráð, umframt at lurta verður eftir sjónarmiðunum hjá fráhaldsrørdsluni.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

§ 1.

ásetir, hvat er rúsdrekka og hvat ikki verður roknað sum rúsdrekka. Hetta er sambært higartil galdandi skipan, og hevur Tjaldurs Apotekið eins og eftir higartil galdandi skipan einkarrætt til innflutning av denatureraðum spritti og spriti til tekniska nýtslu.

§ 2.

ásetir, at tað er bannað at bryggja ella framleiða rúsdrekka, ella gera drekkiligar ódrekkiligar vørur við alkoholi. Tó kann landsstýrið eins og higartil loyva bryggjaríunum at bryggja øl við alkoholi.

§ 3.

ásetir at Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarrætt til innflutning av rúsdrekka. Tað verður eisini í stk. 2 heimilað landsstýrinum møguliga at loyva undantak frá reglini um einkarinnflutning við at loyva ferðandi at hava við sær eina ávísa nøgd, tá tey koma til Føroyar.

Tað verður eins og nú ikki loyvt at innflyta øl, sum í sær hevur meira enn 4,6 vektprosent av alkoholi.

§ 4.

ásetir, at Rúsdrekkasøla Landsins eisini hevur einkarrætt til sølu av rúsdrekka, tó kann Rúsdrekkasøla Landsins geva føroysku bryggjarunum loyvi til sølu, og eru persónar og feløg, sum hava fingið loyvi frá loyvisnevndini eisini undantikin. Eisini feløg, ið selja til limirnar, koma undir reglurnar um, at loyvi krevst frá loyvisnevndini. Undir hesa reglu koma sostatt teir sokallaðu ølklubbarnir. Tó krevst ikki loyvi tá feløg ella líknandi, t.d. ítróttarfeløg hava onkra einstaka veitslu fyri limunum ella tá ein skúlaárgangur hevur t.d. 25-ársveitslu.

§ 5.

ásetir, at tað ikki er loyvt at selja ella útflýggja rúsdrekka til persónar undir 18 ár. Harafturat verður ásett, at útflýggjarin skal tryggja sær, at móttakarin er yvir 18 ár, og ásetir landsstýrið nærri reglur hesum viðvíkjandi, t.d. um krav um samleikaprógv við vælíknandi andlitsmynd.

§ 6.

Rúsdrekkasøla Landsins verður sjálvstøðugur stovnur undir landsstýrinum við egnum rakstrarstaði á fíggjarlógini.

Landsstýrið ger reglur um skipan og rakstur av stovninum, har m.a. verður fyriskipað:

- Landsstýrið setur leiðaran, sum mótvegis landsstýrinum hevur ábyrgd av fíggjarliga rakstrinum, skipan og uppbygging av einkarsøluni. Leiðarin setur neyð ug starvsfólk.
- Stovnurin verur fíggjaður yvir raksturin.
- Tað áliggur stovninum at reka upplýsingarvirksemi til fyribyrgjan av rúsdrekkamisnýtslu.
- Um hvussu leingi og hvørjar dagar rúsdrekkasølan er opin.
- Reglur um hvussu útflýggjarin tryggjar sær, at aldursmarkið verður hildið.
- Reglur fyri útsølu av øli.
- Reglur um bert at selja kontant.

Í fyrstu atløgu verður eingin sølubúð. Fyrstu tíðina verður rúsdrekkasølan skipað sum postordrahandil. Tá 2 ár eru farin, verður skipanin endurskoðað við møguligari broyting í søluskipanini fyri eyga.

§ 7.

ásetir, at loyvisnevndin, aftaná, at hava fingið ummæli frá myndugleikunum á staðnum, t.d. bygdarráðnum, gevur loyvi til persónar ella feløg sum reka hotel- ella restauratiónsvirksemi at skeinkja rúsdrekka fyri gestunum.

§ 8.

ásetir hvussu nógvar limir loyvisnevndin hevur, og hvussu teir verða valdir. Eftir uppskotinum til nevndarval kemur landsstýrið at hava avgerandi ávirkanina á, hvussu lógin verður umsitin. Landsstýrið hevur møguleika fyri at velja limir soleiðis at flestu økir í landinum verða umboðað, og eisini er møguleiki fyri at lata ávísar áhugabólkar fáa umboðan í nevndina.

§ 9.

ásetir hvørjar treytir persónur skal lúka fyri at fáa loyvi, og eisini tá talan er um eitt felag, skal loyvi vera knýtt at einum persóni.

§ 10.

sigur, at landsstýrið ásetir nærri reglur um útskeinking av rúsdrekka. Her kann talan verða um t.d. útskeinkingartíðir, hæddina á gjaldinum fyri loyvi og um bert at selja rúsdrekka í upplætnum íløtum ætlað til at drekka á staðnum.

§ 11.

ásetir, at loyvisnevndin, um reglur og treytir ikki vera hildnar, kann taka loyvið aftur, og eisini um virksemi elvir til drykkjuskap ella revsiverdar gerðir, men skal løgreglan í hesum førum frammanundan hava ávarað loyvishavaran.

§ 12.

ásetir treytirnar fyri at fáa skonkt á støðum við útskeinkingarloyvi, og má m. a. ikki skeinkjast fyri persónum, ið eftir treytaðum dømi hava fingið álagt at lata seg viðgera fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Eisini bevur stað við útskeinkingarloyvi skyldu til, um persónur er vorðin fullur, at syrgja fyri, at hann kemur trygt til hús, ella at løgreglan tekur sær av honum. Eftir stk. 1, nr. 3, bevur loyvishavari eisini skyldu til at ansa eftir, at hann ikki skeinkir rúsdrekka til bilførarar, ið skulu koyra bil heim frá restauratióni.

§ 13.

ásetir m.a. reglur um, at tað í almennum hølum ikki er loyvt at njóta rúsdrekka, ið gestirnir hava við sær, og eru hetta somu reglur, sum eru galdandi í dag.

§ 14.

ásetir, at ikki er loyvt, at reklamera við rúsdrekka í føroysku fjølmiðlunum, og er hendla regla eisini galdandi í dag.

§ 15.

ásetir revsireglurnar.

§ 16.

sigur, at landsstýrið ásetir, nær lógin kemur í gildi. Landsstýrið ætlar fyrst at seta kap. 3 í gildi tá neyðugu kunngerðirnar eru klárar, soleiðis, at lógin longu í komandi ferðamannatíð fæst at virka, tó í fyrstani soleiðis, at persónar og felløg, sum reka restauratiónsvirksemi fáa serloyvi til innflutning frá landsstýrinum, ella keyp av øli frá føroysku bryggjaríunum.

85. Broyting í lóg um fosturtøku

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at fyrireika broyting í galdandi lóg um fosturtøku í Føroyum, lóg nr. 177 frá 23. juni 1956, og leggja fyri tingið á ólavsøku 1992 uppskot, sum veitir barninum í móðurlívi fulla rættartrygd beilt frá getingi, og sum einans loyvir fosturtøku, tá ið lív stendur móti lívi.

Viðmerkingar

Hin 3. oktober í fjør fingu føroysku myndugleikarnir, løgting og landsstýri, handað eina áheitan frá fleiri enn 170 leiðarum í øllum samkomum, prestum, jarðamøðrum, sjúkrasystrum og læknum um at broyta galdani lóg viðvíkjandi fosturtøku, soleiðis at hitt ófødda barnið fær ta sonu rættarverju, sum tað fødda, og fosturtøka bert verður loyvd, tá ið lív stendur móti lívi.

Áheitanin til løtingið varð beind í rættarnevndina. Haðani hevur einki hoyrst aftur um hesa áheitan.

Men landsstýrið hevur latið við seg koma og hevur í svari til settan fyrispurning, dagfest hin 18. december 1991, sagt seg ikki ætla at broyta verandi lóg um fosturtøku.

Kristiligi Fólkaflokkurin, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur, loyvir sær tí at reisa málið á Føroya Løgtingi.

Samhært upplýsingum frá landslæknanum vóru í 1990 framdar 81 fosturtýningar í Føroyum, í 1989 var talið heilar 95.

Tær flestu fosturtøkurnar fóru fram á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum, 77 í 1990 og 93 í 1989, meðan 4 vóru á Suðuroyar Sjúkrahúsi í 1990 og 2 í 1989. Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi var eingin fosturtøka hvørki í 1990 ella 1989.

Annars hevur landslæknin hetta yvirlit fyri tey seinastu 8 árini:

Tallene for abort ingreb har gennem de senere år været:

	Landssjúkrahúsið	Klaksvíkar sjúkrahús	Suðuroyar sjúkrahús
1990	77	0	4
1989	93	0	2
1988	70	1	4
1987	68	4	5
1986	73	3	3
1985	83	0	2
1984	78	3	2
1983	63	1	5

Talið av livandi føddum børnum í Føroyum hevur gingið støðugt uppeftir, síðan lógirnar um barsilsorlov og barnastyrk vórðu samtyktar á Føroya Løgtingi í 1987.

Antallet af levendefødte børn har i de senere år været som følger:

1990	943
1989	933
1988	864
1987	780
1986	789

1981 = 85:	gennemsnitlig pr. år			717
1975 = 80:	-	-	-	760
1971 = 75:	-	-	-	796
1965 = 70:	-	-	-	892
1960 = 64:	-	-	-	808

Vandi kann vera fyri, at framkomna tøknin og fosturkanningar fara at økja um talið av fosturtýningum, og at tað mest av øllum kenur at ganga út yvir tey, ið líða undir einum ella øðrum breki. Tí eiga fosturkanningar at verða bannaðar í Føroyum.

Í danska tíðarritinum "Ugeskrift for læger" 25. november 1991 skrivar heinspekingurin Niels Holtug grein og skjýtur upp, at brekaðir nýfødingar verða tiknir av døgum á sama hátt, sum barnið í móðurlívi í dag verður tað.

Danski heilsumálaráðharrin hevur tó hvassliga mótmælt hesum, og tað sama hevur formaðurin fyri etisku nevndini hjá danska læknafelagnum gjørt.

Men har ein skriðan er lopin, er onnur vantandi, sigur orðatakið.

Tí er neyðugt við greiðum reglum og lógum. Virðingin fyri ti einstaka má gulda tað fødda eins vael og tað ófødda barnið.

Víst kann verða til donsku lógina frá 22. mai 1987 "om oprettelse af et etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg", sum í endamálsgreinini sigur, at ráðið í virki sínum byggir á ta fortreyt, at mannalív byrjar í gitingini.

Henda lóg er, óvist av hvørjari grund ikki enn sett í gildi í Føroyum. Men tað fer nú at verða skotið upp.

Somuleiðis kann vetða víst á ST- sáttmálan frá 20. november 1989 um rættindi hjá børnum, sum landsstýrið hin 31. oktober 1991 legði fyri løgtingið at samtykkja.

ST-sáttmálin sigur m.a.:

"...at barnið vegna likamligt og sálarligt óbúni hevur tørv á serligari vernd og umsorgan, bæði fyri føðing og eftir føðing, herundir eisini hóskandi løgfrøðiliga verju."

Franski arvagranskarin Jerome Lejeune, professari í París, tekur soleiðis til í yvirlýsing síni um barnið í móðurlívi:

"Tá ið barnið er gitið í móðurlívi, er tað ein livandi skapningur. Tað hevur eginleikar, sum ger tað ólíkt øllum øðrum minniskjum, eisini ólíkt mammuni, sum verjir tað og gevur tí føði, og tí kann einki setast í staðin fyri tað.

Heilt frá gitingini og til ellisár er tað tann sama menniskjan, sum veksur, búnast og at enda doyr.

Læknavísindin skal tæna og verja ta livandi menniskjuna frá tí, hon er gitin í móðurlívi, til hon doyr ein náttúrligan deyða.

Sjúklingurin hevur krav um óskerda virðing uttan mun til aldur, sjúku ella aðrar veikleikar. Tá ið læknin møtir neyð, sum stavar frá eini syndarligari lagnu, er tað skylda og ábyrgd hansara at veita alla ta hjálp til mammu og barn, ið gjørligt er.

Tað stríðir tí ímóti virki læknans at taka lív fyri at loysa samfelagslig, liggjarlig, siðmenningarlig og arvalig mál."

Eisíni orðini hjá Móður Teresu eiga at vera havd í huga, tá ið hon í 1979 fekk handað Nobel-friðarheiðursløninа og segði:

"Tær tjóðir, ið loyva fosturtøku, mega sigast at vera tær fátækastu av øllum tjóðum. Tílíkur fátækradómur er verri enn tann materialistiski.

Fosturtøka er hernaður móti børnum, og skríggið frá tí óføddu er størsta hóttanin í dag móti friðinum."

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 85/1991: Broyting í lóg um fosturtøku.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 11. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 25. mars beint í rættarnevndina.

Uppskotstillarin mælir til at áleggja landsstýrinum at fyrireika broytingar í lóggávu um fosturtøku, soleiðis at fosturtøka bert verður loyvd, tá ið, sum tikið verður til í uppskotinum, "lív stendur móti lívi".

Uppskotið hevur samband við áheitan frá navngivnum borgarum til løgtingið um sama evnið.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fundir við landslæknan, ið eftir áheitan hevur latið nevndini upprit um støðuna viðvíkjandi fosturtøku í Føroyum.

Nevndin hevur eisini havt fund við Turið Holm, yvirlækna, á landssjúkrahúsinum.

Nevndin skal gera vart við niðurstøðu landslæknans, ið vísir, at Føroyar hava lægsta tal av lógligum fosturtøkum í norðanlondum. Niðurstøðan vísir eisini, at talið av lógligum fosturtøkum í Føroyum hevur verið so at siga óbroytt seinastu 8 árini. Niðurstøða landslæknans, at vit ikki hava fría fosturtøku í Føroyum, og at einki er, ið bendir á, at lógin ikki verður hildin. Landslæknin mælir víðari í niðurstøðu síni frá at gera broytingar í lóggávuni um fosturtøku í Føroyum. Nevndin skal gera vart við, at Turið Holm, yvirlækni, á fundi við nevndini tann 2. apríl boðaði frá, at hon var púra samd við niðurstøðu landslæknans.

Nevndin er samd um, at uppritið frá landslæknanum, ið lagt er við málium, vísir, at tørvur er ikki á nakrari lógarbroyting á hesum øki. Nevndin setir tí einki uppskot fram.

Víst verður annars til hjálagda upprit frá landslæknanum.

86. Lóg um etiskt ráð fyri biomedisinska gransking

Uppskot

til

Løgtingið góðkennir, at "Lov om oprettelse af et etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg" frá 3. juni 1987 verður lýst at galda í Føroyum við teimum umsitingarligu broytingum, ið landsstýrið heldur vera neyðugar at gera.

Viðmerkingar

Við tí framkomnu tøkni, vit í dag ráða yvir, gerst tað neyðugt at seta greiðar reglur, ið verja menniskjað og varðveita virðingina fyri tí einstaka.

Av serliga stórum týdningi er henda lóg um etiskt ráð og biomedisinska gransking, tí at hon verjir eisini barnið í móðurlívi, sum endamálsgreinin er orðað: "Ráðið skal í virki sínum byggja á ta fortreyt, at mannalív byrjar í getningini."

Annars verður víst til viðmerkingarnar í tingmáli nr. 85 broyting í lóg um fosturtøku.

Áilt

í

Løgtingsmáli nr. 86/1991: Lóg um etiskt ráð og biomedisinska gransking.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 11. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 25. mars beint í rættarnevndina.

Nevndin ger vart við, at málið er so umfatandi, at tað krevur gjølligar kanningar, ið nevndin ikki hevur havt høvi og umstøður at gera. Nevndin mælir tí til, at málið verður sent landsstýrinum til kanningar, men setir annars uppskot fram.

87. Lóg um framleiðsluábyrgd

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 371 frá 7. juni 1989 "om produktansvar" verður sett í gildi fyri Føroyar við kongaligari fyriskipan.

Viðmerkingar

Við lóg nr. 371 frá 7. juni 1989 um framleiðsluábyrgd eru framdar vanligar reglur um ábyrgd hjá framleiðara ella millumhandlara fyri skaðar, sum ein brekað vøra hevur gjørt, ið er framleidd ella útflýggjað av viðkomandi.

Lógin kann eftir § 18 setast í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan við nøkrum frávikum eftir føroyskum viðurskiftum.

Lógin byggir á EF-skipan um at samskipa reglurnar um framleiðsluábyrgd.

Mett verður, at samsvarandi lógarreglur verða framdar í hinum norðanlondum.

Ongar vanligar lógarreglur vóru galdandi í Danmark ella í Føroyum, áðrenn henda lóg um ábyrgd fyri skaða av vandamiklari framleiðslu kom í gildi í Danmark.

Galdandi reglur frammanundan bygdu á rættarsiðvenju. Eftir hesum rætti, sum framvegis er galdandi í Føroyum, kann ein framleiðari ella seljari av eini vandamiklari vøru koma undir ábyrgd bæði fyri skaða á persónar og lutir. Ábyrgdin fevnir bert um skaðar, ið vøran ger á triðjamann og ikki skaðan á sjálvan tann vandamikla lutin. Tílíkur skaði kemur undir vanligu reglurnar um brek við tí selda lutinum.

Ein vøra (lutur) verður mett sum vandamikil, um hon hevur tílíkar eginleikar, at hon undir vanligari nýtslu kann volda skaða.

Eftir nýggju lógini hava bæði framleiðari og millumhandlarar eina objektiva ábyrgd fyri tí skaða, ið vøran kann elva til, og tann, sum hevur verið fyri skaðanum, kann sjálvur avgera, hvønn hann vil halda seg til, um hann ynskir at gera ábyrgd galdandi.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá ymsum felløgum og stovnum og hava teir, sum hava givið ummæli, mælt til, at lógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

Viðlagt fylgir eintak av lógini og ummælunum. + skjøl

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 87/1991: Lóg um framleiðsluábyrgd.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 25. februar 1992 beint í rættarnevndina.

Í málinum mælir landsstýrið løgtinginum til, við uppskoti til samtyktar, at góðkenna, at lóg nr. 371 frá 7. juni 1989 um framleiðsluábyrgd verður sett í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan. Lógin snýr seg um at seta í gildi vanligar reglur um ábyrgd hjá framleiðara ella millumhandlara fyri skaðar, sum ein vøra, ið hevur brek ella er skaðilig, hevur gjørt, og sum er framleidd ella útflýggjað viðkomandi. Uppskotið hevur verið til umrøðis hjá ymiskum feløgum og stovnum, og hava tey, sum hava givið ummælið, mælt til, at lógin verður sett í gildi fyri Føroyar. Landsstýrið upplýsir eisini í viðmerkingunum, at samsvarandi lógarreglur fara at verða framdar í hinum norðanlondunum.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd rættarnevnd løgtinginum til at samtykkja málið óbroytt.

88. Broytingar í mannarættindarsáttmálanum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at uppískoytisprotokoll nr. 7 til mannarættindarsáttmálan frá 4. november 1950 verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at nevnda uppískoytisprotokoll til mannarættindarsáttmálan verður lýst at galda fyri Føroyar.

Sáttmálin frá 4. november 1950 og uppískoytisprotokollirnar nr. 2-6 og 8 eru kunngjørdar at galda fyri Føroyar. + eintak av protokollini

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 88/1991: Broytingar í mannarættindarsáttmálanum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 25. mars beint í rættarnevndina.

Í málinum mælir landsstýrið løgtinginum til, við uppskoti til samtyktar at góðkenna, at uppískoyti til protokollina, nr. 7 til mannarættindarsáttmálan frá 4. november 1950 verður lýst at galda í Føroyum.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

89. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

Uppskot

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

§ 1.

Í § 3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20. november 1969 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya við seinni broytingum verða orðini "30. apríl 1992" broytt til: "30. apríl 1995".

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 30. apríl 1992.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om lotteritilladelse til Útvarp Føroya.

§ 1.

I § 3 i lagtingslov nr. 71 af 20. november 1969 om lotteritilladelse til Útvarp Føroya med senere ændringer ændres ordene "30. april 1992" til: "30. april 1995".

§ 2.

Denne lov får gyldighed fra 30. april

Viðmerkingar

Útvarp Føroya hevur søkt um, at lógin um happadráttarloyvi, ið gongur út 30. apríl 1992, verður endurnýggjað uttan tíðaravmarking.

Í umsóknini um endurnýgging av loyvinum hevur útvarpið upplýst fylgjandi: "Seinastu trý árini - frá 01.01.1989 til 31.12.1991 hevur úrslitið av V4-spælinum verið hetta:

Bruttoinngjald		**18.819.407**
Vinningar	8.133.743	
Skattur	1.265.434	
Umsiting	562.113	9.961.290
Ágóði útvarpsins		8.858.117
Postgjald	1.656.842	

V4-spælið hevur sostatt árliga givið slakar 3 mió. kr. í útvarpsins part seinastu trý árini. Peningurin hevur alstóran týdning fyri raksturin hjá útvarpinum. Útvarpið hevur nú rikið V4-spælið í 22 ár, og hetta er vorðið ein fastur partur av inntøkugrundarlagnum hjá stovninum."

Landsstýrið loyvir sær at mæla til, at lógin verður framlongd, tá útvarpinum framvegis tørvar pening til raksturin, serstakliga til rentur og avdrátt av lánum í sambandi við nýggju útvarpshúsini.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 89/1991: Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 25. februar 1992 beint í mentunar- og skúlanevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

90. Broyting í løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai 1977 um uppískoytisveiting til einkjur verða hesar broytingar gjørdar.

1) § 2 verður orðað soleiðis:

"Rætt til uppískoytisveiting eigur tann einkja, sum hevur rætt til einkjupensjón sambært § 27, 1. og 2. stk., sbr. § 31 í lóg fyri Føroyar um almenna forsorg.

Stk. 2. Rætt til uppískoytisveiting eigur eisini einkja, sum hevði einkjupensjón, tá ið yngsta barn hennara fylti 18 ár."

2) § 3 verður orðað soleiðis:

"Uppískoytisveiting sambært § 2, 1. stk. er hin sama sum talið av teimum til cina og hvørja tíð galdandi avlamisviðbótum og óarbeiðsførisviðbótum samhært § 4 í lóg fyri Føroyar um avlamispensjón.

2. stk. Uppískoytisveiting sambært § 2, 3. stk. er hin sama sum grundupphæddin í einkjupensjónini við pensjónsviðbót umframt veiting sambært 1. stk."

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om tillægydelse til enker.

§ 1.

I lagtingslov nr. 36 af den 4. maj 1977 om tilæggsydelse til enker foretages følgende ændringer:

1) § 2 affatte således:

"Ret til tillægsydelse har den enke, som har ret til enkepension i henhold til § 27, stk. 1 og 2, jvf. § 31 i lov for Færøerne om offentlig forsorg.

Stk. 2. Ret til tillægsydelse har tilige en enke, som fik enkepension, da hendes yngste barn fyldte 18 år."

2) § 3 affattes således:

"Tillægsydelse i henhold til § 2, stk. 1, udgør samme beløb som summen af de til enhver tid gældende invalidetetsbeløb efter § 4 i lov for Færøerne om invalidepension.

2. stk. "Tillægsydelsen i henhold til § 2, 3. stk. udgør samme beløb som grundydelsen i enkepensionen med pensionstillæg samt tillæg i henhold til 1. stk."

3) § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis:
"Uppískoytisveiting sambært § 2, 2. stk., sbr. § 3, 1. stk., verður at lækka í mun til inntøkuna eftir reglunum í 2. - 4. stk."

4) Í § 4 verður sett sum nýtt 5. stk. :
"Uppískoytisveitingin sambært § 2, 2. stk., samanber § 3, 2. stk., verður útroknað á sama hátt sum einkjupensjón."

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1992.

3) § 4, stk. 1, affattes således:
"Tillægsydelse i henhold til § 2, stk., 2, jvf. § 3, stk. 1, nedsættes i forhold til indtægten efter reglerne i stk. 2 - 4."

4) Til § 4 føjes som nyt stk. 5:
"Tillægsydelse i henhold til § 2, stk., 2, jvf. § 3, stk. 2, beregnes på

Viðmerkingar

Einkjur hava so langt aftur, sum til ber at koma í søguna, havt eina serstøðu og mangan havt hjálp fyri neyðini meira enn onnur.

Hetta hevur ikki minst verið galdandi í Føroyum.

Tí var tað ikki annað enn náttúrligt, at Føroya Løgting mitt í sjeytiárunum samtykti at veita einkjum eitt uppískoyti úr landskassanum, sum tær donsku einkjurnar ikki fingu. Grundirnar vóru tá lagdar til ein øðrvísi einkjupolitikk her á landi enn tann í Danmørk.

Rætt til einkjupensjón eigur einkja, ið hevur børn undir 18 ár, og hon fær eisini uppískoytisveiting. Um einkju, ið ikki hevur børn undir 18 ár, tørvar hjálp frá tí almenna, kann hon fáa stuðul eftir forsorgarlógini, men hon fær ikki uppískoytisveiting smb. lógini í dag.

Uppískoytisveitingin er av somu støddum sum avlamisviðbót til avlamispensjón. Sostatt fær einkja við uppískoytisveiting tað sama sum avlamispensjónistur við meðal avlamispensjón.

Lógin um uppískoytisveiting til einkjur kom at galda frá 1. oktober 1977 og varð víðkað eitt sindur í 1983 til at galda eisini 1 ár aftan á, at yngsta barnið er vorðið 18 ár og rætturin til einkjupensjón tí mistur.

Hjá teimum, sum fáa einkjupensjón, er upphæddin so lítil, at tær klára seg ikki við tí og noyðast út frá heimi og børnum á ein arbeiðsmarknað, sum er fyltur við arbeiðsleysum.

Tí er meiri meining í, at einkjupensjónin er so fræg, at tær, sum vilja vera heima og ansa børnum sínum, fáa møguleika til tað og lata onnur sleppa framat á arbeiðsmarknaðinum.

Harumframt eru einkjur, sum onga pensjón fáa, tí at tær eingi børn hava undir 18 ár og ikki eru komnar til pensjónsaldur.

Einkjur eiga heldur at verða sammettar við persónar við hægstu avlamispensjón enn við persónar við meðal avlamispensjón.

Tí verður skotið upp, at uppískoytisveitingin í framtíðini verður samtalið av avlamisviðbót og óarbeiðsførisviðbót (og ikki bert avlamisviðbót).

Uppískoytisveitingin, sum í dag er 1.762 kr., verður eftir uppskotinum 4.205 kr. um mánaðin. Grundupphæddin er 3.784 kr. um mánaðin og pensjónsviðbót 679 kr. um mánaðin, um eingin onnur inntøka er.

Hevur pensjónisturin aðra inntøku, minkar uppískoytisveitingin við 5 kr. fyri hvørjar 100, ið ársinntøkan er omman fyri 80.000 kr.

Somuleiðis verður skotið upp at víðka heimildina til at rinda uppískroytisveiting, soleiðis at hon eisini er galdandi fyri einkjur eftir § 27, 2. stk. í forsorgarlógini og tekur tær einkjurnar við, sum hava fingið einkjupensjón, men halda uppat við hesum, tí at yngsta barnið verður 18 ár.

Hækkingin av uppískoytisveitingini metti Klaus Hermann, fyrrv. almannastjóri, í 1988 fara at hava eina meirútreiðslu við sær upp á o.u. 1,6 mió. kr. árliga.

Broytingina, viðvíkjandi uppískoytisveitingini, metti hann at hava eina brutto-meirútreiðslu við sær upp á o.u. 1,7 mió. kr. árliga.

Men samstundis verður sparing í útreiðslunum á forsorgarlógini uppá uml. 1,2 mió. kr., og eru 3/4 av hesum føroysk útreiðsla (0,9 mió. kr.)

Netto útreiðslan hjá landskassanum verður sostatt uml. 0.8 mió. kr.

Víst kann eisini verða á, at landskassin bara í 1991 spardi 375.000 kr. í útreiðslum til einkjupensjón sambært eykafíggjarlógaruppskoti hjá landsstýrinum, so at samanlagt er her ikki talan um stórvegis meirútreiðslur fyri landskassan.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 90/1991: Broyting í løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 12. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 25. mars beint í Almanna- og Heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini fingið kunning frá Almannastovuni um veitingar til einkjur.

Rætt til einkjupensjón hevur eftir § 27 stk. 1 í forsorgarlógini einkja, sum hevur eitt ella fleiri børn undir 18 ár. Grundað á, at danir hava annan politikk viðvíkjandi einkjum, varð í 1977 í Føroyum gjørd ein serlig skipan við eini uppískoytisveiting. Dønum hóvar betur fyribrygdi, teir nevna "førtidspensionist".

Viðvíkjandi rætti til uppískoytisveiting eru somu reglur galdandi sum í forsorgarlógini.

Í § 27, stk. 2 stendur at "tá heilsa ella onnur serlig viðurskifti tala fyri, kann eftir innstilling frá kommunu, og eftir viðmæli frá sýslumanni gevast pensión til einkju og aðrar stakar kvinnur, sum eru fyltar 50 ár, ella sum hava fingið pensión eftir stk. 1". Hetta er tó ikki galdandi fyri uppiskoytisveiting.

At ikki er lætt at fáa hesa pensión, siga tøltini okkum, tí bert 3 fólk fáa veiting eftir hesum stk. í dag.

Upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru í skjølum, sum ein myndugleiki hevur gjørt, ella sum eru komin myndugleikanum í hendi áðrenn gildiskomu lógarinnar, eru tó umfatað̀ar av ásetingunum í kapitli 4, um so er, at skjølini eru komin til eitt mál, ið er ella hevur verið til viðgerðar hjá einum

Stk. 2. Bestemmelsen i stk. 1 finder dog ikke anvendelse, hvis videregivelsen påfører myndigheden et merarbejde, der væsentligt overstiger den interesse, den anden myndighed har i at få oplysningerne.

§ 31.

Den, der virker inden for den offentlige forvaltning, må ikke i den forbindelse skaffe sig fortrolige oplysninger, som ikke er af betydning for udførelsen af den pågældendes opgaver.

Kap. 9. Ikrafttræden, forholdet til anden lovgivning m.v.

§ 32.

Loven træder i kraft den 1. januar 1993. Samtidig ophæves lov af 2. februar 1866 om erklæringers meddelelse til ansøgere og klagere.

§ 33.

Bestemmelser i andre love eller bestemmelser fastsat i henhold til lov, som i videre omfang end bestemmelserne i kapitel 2 medfører inhabilitet, opretholdes.

§ 34.

Oplysninger om faktiske omstændigheder, der indeholdes i dokumenter, der er udfærdiget af en myndighedm eller er kommet i en myndigheds besiddelse før lovens ikrafttræden, er dog omfattet af bestemmelserne i kapitel 4, hvis dokumenterne er indgået i en sag, der er eller har været under behandling

fyrisitingarmyndugleika aftaná nevndu tíð, og upplýsingarnar eru ella hava havt stóran týdning fyri avgerðina í málinum.

af en forvaltningsmyndighed efter det nævnte tidspunkt, og oplysningerne er eller har været af væsentlig betydning for sagens afgørelse.

§ 35.

Ásetingar í øðrum lógum ella reglum ásettum við heimild í lóg, ið seta størri krøv viðvíkjandi innihaldinum í grundgevingini enn ásett í § 23, vera verandi í gildi.

§ 35.

Bestemmelser i andre love eller bestemmelser fastsat i henhold til lov, somstiller mere omfattende krav til begrundelsens indhold end de, der følger af § 23, opretholdes.

Viðmerkingar

Í 1987 heitti Føroya Blaðmannafelag á landsstýrið um at seta í gildi løgtingslóg um innlit í fyrisitingina. Hetta uppskot bygdi á gomlu donsku lógina um almenn innlit í fyrisitingina. Henda lóg fór úr gildi í Danmark 1. januar 1987, tá hon var avloyst av einari nýggjari lóg um innlit í fyrisitingina og einari lóg um fyrisiting, sum báðar hingu saman.

Í 1990 varð málið framlagt í løgtinginum av Sjálvstýrisflokkinum. Landsstýrið førdi tá fram, at arbeitt var í landsstýrinum við hesum spurningi, og samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fram lógaruppskot um innlit í fyrisitingina. Tá landsstýrið fór í holt við at gera reglur fyri økið almenn fyrisiting, varð mett, at best var at fáa reglur fyri alt økið, tí hóast hetta óivað førir nakað meirarbeiði við sær, so verður trygdin hjá borgarunum nógv betur, og sleppur fyrisitingin frá nógvum ivaspurningum, tí klárar reglur koma á økinum.

Fyriliggjandi uppskot, t. e. uppskot til løgtingslóg um fyrisiting og uppskot til løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, eru samantengd soleiðis, at ikki ber til at samtykkja annað, men ikki bitt.

Uppskotini líkjast nógv danskari lóggávu á økinum, men er hetta tilætlað, tí stórt sæð hava vit sama fyrisitingarliga siðaarv sum danir, og eru hesar báðar lógirnar í mongum førum bert ein niðurskriving av tí, sum longu er galdandi uttan skrivaðar reglur. Eisini kunnu danskar løgfrøðiligar bókmentir á økinum vera til stóra hjálp, tá tulkingarspurningar koma fyri.

Um hesar lógirnar verða settar í gildi, fara tær at verða eitt gott grundarlag undir arbeiðinum hjá einum møguligum komandi løgtingsins umboðsmanni.

Fyrisitingarlógin

Lógin er galdandi fyri alla almennu fyrisitingina. Sostatt fevnir lógin um allar fyrisitingarmyndugleikar, bæði landsmyndugleikar og kommunalar myndug-

leikar og t.d. serligar nevndir ella ráð ella serstakar stovnar sum Landsbankin ella Sjónvarp Føroya ella almennir grunnar settir á stovn við heimild í lóg.

Landsstýrið kann í ávísum førum áseta reglur um, at lógin heilt ella fyri ein part skal verða galdandi fyri nærri ásett feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið ikki kunnu roknast til almennu fyrisitingina.

Lógin er galdandi fyri mál, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð. Tó eru tvey undantøk. Ásetingarnar í kapittul 2 um ógegni eru soleiðis eisini galdandi fyri viðgerðina av málum um gerð av sáttmálum ella líknandi eginrættarligum gerðum, og eru ásetingarnar í kapittul 8 um tagnarskyldu v.m. galdandi fyri alt virksemið innan almennu fyrisitingina.

Ógegni

Í lógarinnar kapittul 2 eru ásettar reglur um persónligt og serstakt ógegni, tvs. spurningurin um, undir hvørjum umstøðum persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina orsakað av mótstríðandi áhugamálum, skal lata vera við at taka lut í viðgerð myndugleikans av einum ávísum máli.

Ásetingarnar hava til endamáls deils at tryggja, at tað ikki í sambandi við viðgerðina og avgerðina av málinum verða tikin óviðkomandi fyriliti, deils at tryggja álit borgaranna á almennu fyrisitingina.

Ásetingarnar eru í høvuðsheitunum ein lógfesting av teimum vanligu grundreglunum um ógegni, ið higartil hava verið galdandi.

Ásetingarnar í kapittul 2 hava reglur um, í hvørjum føri tað vanliga verður talan um serstakt ógegni. Talan er tó ikki um ógegni, um áhugamálini eru soleiðis háttað ella so veik, ella at málið ella virksemið hjá viðkomandi í sambandi við málsviðgerðina er soleiðis háttað at eingin vandi má metast at vera fyri, at avgerðin í málinum kann fara at verða ávirkað av óviðkomandi fyriliti.

Fyri at tryggja, at spurningurin um ógegni verður reistur, er ásett, at hann sum veit, at tað fyri hansara viðkomandi kann verða talan um ógegni, hevur skyldu til at boða myndugleikanum frá hesum.

Um persónur er ógegnigur, kann hann ikki taka avgerð, verða við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av avvarðandi máli.

Vegleiðing og umboðan

Ásetingarnar í lógarinnar kapittul 3 hava almennar ásetingar um skylduna hjá fyrisitingarmyndugleikanum til at vegleiða borgararnar og um rætt borgaranna til at lata seg umboða ella fáa hjálp frá øðrum undir viðgerðini hjá myndugleikanum av einum máli.

Reglurnar um vegleiðingarskylduna v.m. samsvara tí, sum higartil hava verið mett at vera galdandi sum góður fyrisitingarskikkur.

Skjalainnlit partanna

Sambært reglunum í kapittul 4 hevur persónur, sum er partur í einum máli, har avgerð er ella fer at verða tikin, vanliga rætt til at verða kunnaður um øll skjølini í málinum. Tó kann persónur, sum søkir ella hevur søkt um starv ella um framflytan í hægri starv í almennari tænastu bert krevja, at fáa innlit í tey skjøl v.m., ið viðvíkja hansara egnu viðurskiftum.

Undantikin frá rættinum til skjalainnlit eru innanhýsis arbeiðsskjøl við ávísum undantøkum, sum eru nevnd í § 13, og í § 14 eru nevnd nøkur skjøl, sum ikki koma undir reglurnar um skjalainnlit. Sambært § 15 kann høvið til at fáa innlit í skjøl harumframt avmarkast í tann mun áhugi partanna í at kunna nýta kunnleikan til skjølini í málinum fyri at kunna røkja sín tørv, má metast at eiga víkja fyri avgerandi umhugsni fyri viðkomandi sjálvum ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum.

Í § 14 eru eisini ásettar serstakar reglur um viðgerðina av málum um skjalainnlit.

Um áheitan partanna um skjalainnlit kemur meðan málið verður viðgjørt, er endamálið við at fáa skjalainnlit sum oftast, at viðkomandi ynskir at kunna seg við tað grundstøði, sum myndugleikin fer at byggja sína avgerð á. Tessvegna er í § 11 ásett, at um ein partur í málinum biður um skjalainnlit meðan málið verður viðgjørt, so skal avgerðin í málinum útsetast, til parturin hevur havt høvi til at kunna seg við skjølini í málinum. Hetta er tó ikki galdandi, um áhugi partanna í avgerðini í málinum má metast at eiga at víkja fyri stórum almennum ella privatum áhugamálum. Henda áseting skal síggjast í samanhangi við § 20.

Partshoyring

Sambært reglunum í §§ 18-19 skal ein myndugleiki gera ein part kunnigan við upplýsingar, og geva honum høvi at geva sítt ummæli. Reglurnar hava til endamáls at tryggja, at parturin í einum fyrisitingarmáli fær høvi til at kunna seg við málið og koma við sínum viðmerkingum til tær veruligu umstøðurnar í málinum, áðrenn avgerð verður tikin. Kravið, um at partarnir skulu hoyrast, er tó avmarkað til bert at fevna um føri, har tað er orsøk til at halda, at partarnir hava áhuga fyri hesum, og har sum medvirkan frá pørtunum má metast at kunna betra avgerðargrundarlag myndugleikans.

Sambært reglunum skal parturin í einum máli hava høvi til at geva sítt ummæli innan avgerð verður tikin. Hetta er tó bert galdandi, um so er, at myndugleikin til nýtslu fyri avgerðina í málinum hevur upplýsingar um veruligu umstøðurnar, og sum parturin ikki veit, at myndugleikin hevur fingið. Tað er eisini ein fortreyt, at tað er rímuliga sannlíkt, at parturin fer at kunna rætta ella leggja aftur at hesum upplýsingum, og at tær ikki hava eitt innihald, sum ger, at tær kunnu fara at verða undantiknar skjalainnliti sambært reglunum í kapittul 4.

Grundgeving

Reglurnar í § 6 áseta, at tá ein avgerð verður skrivliga fráboðað, so skal hon hava eina grundgeving, um ikki parturin heilt og fult hevur fingið viðhald. Avgerðir, ið verða fráboðaðar munnliga, skulu grundgevast skrivliga um so er, at viðkomandi partur innan 14 dagar eftir, at avgerðin er fráboðað, biður um tað.

Grundgevingin skal altíð vísa til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun avgerðin er grundað á fyrisitingarliga meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, sum hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini. Harumframt skal grundgevingin um neyðugt hava eina stutta frágreiðing um tær verulígu upplýsingar, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.

Kæruvegleiðing

Í kapittul 8 eru ásettar reglur um kæruvegleiðing. Her verður ásett, at um avgerðin ikki til fulnar gongur einum parti á møti, so skal hon hava eina vegleiðing um kærumøguleika, ið hevur upplýsing um, hvønn kærast kann til, og um mannagongdina tá kært verður. Tað er tó ein fortreyt her, at avgerðin kann kærast til ein annan fyrisitingarmyndugleika, og at hon er skrivlig.

Sambært reglunum skal vegleiðing um, at málið kann leggjast fyri dómstólarnar, vanliga ikki latast, men um málið skal vera lagt fyri rættin innan eina ávísa freist, skal hetta vera upplýst.

Tagnarskylda

Í lógarinnar kapittul 8 eru ásettar reglur, ið avmarka rættin hjá myndugleikunum at lata trúnaðarupplýsingar um borgararnar víðari til aðrar fyrisitingarmyndugleikar. Eisini eru ásettar reglur um rættin hjá einum fyrisitingarmyndugleika at fáa til vega trúnaðarupplýsingar um borgararnar til nýtslu í málsviðgerðini.

Sambært reglunum um tagnarskyldu hava øll, sum virka í almennu fyrisitingini tagnarskyldu viðvíkjandi trúnaðarupplýsingum, jbr. § 152 og §§ 152c-152f í borgarligu revsilógini. Ein upplýsing má metast at vera ein trúnaðarupplýsing, tá hon við lóg ella aðrari gyldugari áseting er merkt soleiðis, ella tá tað annars er neyðugt av hulda hana loyniliga fyri at verja týðandi umhugsni viðvíkjandi almennum ella privatum áhugamálum. Í § 26, stk. 1 er uppreksað ein rað av fyrilitum viðvíkjandi almennum og privatum áhugamálum, sum serliga kunnu geva grundir fyri, at ein upplýsing má metast at vera ein trúnaðarupplýsing. Uppreksingin er tó ikki tømandi.

Ásetingarnar um tagnarskyldu avmarka eisini høvi hjá viðkomandi myndugleika at áleggja persónum, ið virka innan almennu fyrisitingina, tagnarskyldu viðvíkjandi eini upplýsing. Tagnarskylda viðvíkjandi eini upplýsing kann einans áleggjast um so er, at upplýsingin má metast at vera ein trúnaðarupplýsing. Sostatt kann ikki áleggjast persóni í almennari tænastu ella starvi tagnarskyldu við-

víkjandi einhvørjari upplýsing, sum viðkomandi er vorðin kunnigur um í síni tænastu ella sínum starvi, uttan so, at tað við aðrari lóggávu er ásett ein serstøk regla um tagnarskyldu á tí økinum.

At enda gevur § 26 eina heimild til, at ein fyrisitingarmyndugleiki kann áseta, at ein persónur uttan fyri almennu fyrisitingina hevur tagnarskyldu viðvíkjandi eini upplýsing, sum myndugleikin letur honum, uttan at hava skyldu til hetta.

Ásetingarnar um at lata víðari trúnaðarupplýsingar til aðrar almennar myndugleikar hava við sær, at upplýsingar um heilt privat viðurskifti hjá einstaklingum bert kunnu latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika við samtykki frá tí, sum upplýsingin viðvíkur. Tílíkar upplýsingar kunnu tó latast víðari uttan samtykki, um so er, at hetta fylgir av lóggávuni annars, ella upplýsingin verður latin víðari fyri at røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt liggja fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva orsøk til at dylja upplýsingina, herundir fyrilitið viðvíkjandi honum, sum upplýsingin viðvíkur, ella tað er ein neyðugur liður í viðgerðini av málinum, at upplýsingin verður latin víðari, ella fyri at ein myndugleiki kann vera førur fyri at inna sínar eftirlits ella umsjónaruppgávur.

Aðrar trúnaðarupplýsingar kunnu, umframt í teimum omanfyri nevndu førum, latast víðari eisini uttan samtykki, tá tað má metast, at upplýsingin fer at hava avgerandi týdning fyri virkið hjá tí myndugleika, sum skal hava upplýsingina ella fyri eina avgerð, sum hesin myndugleiki skal taka.

Í málum, ið verða reist við umsókn, er ásett ein serstøk avmarking í rættinum hjá einum fyrisitingarmyndugleika at fáa sær fatur á upplýsingum um heilt privat viðurskifti hjá umsøkjaranum.

Ásetingin byggir á tað sjónarmið, at hann, sum hevur søkt um einhvønn fyrimun, t.d. eina almannaveiting, sjálvur eigur at hava ávirkan á, hvørjar upplýsingar um hansara heilt privatu viðurskifti skulu fáast til vega til nýtslu fyri viðgerðina av viðkomandi máli. Um so er, at umsøkjarin ikki vil geva samtykki til at ein ávís upplýsing, sum viðkomandi myndugleiki heldur hevur avgerandi týdning fyri avgerðina í málinum, verður útvegað, má umsóknin eftir umstøðunum verða noktað. Ásetingin hevur sostatt við sær, at tað vanliga er viðkomandi umsøkjari sjálvur, sum avger, um áhugin fyri at fáa viðkomandi veiting ella loyvi er so stórur, at hann kann góðtaka, at eisini heilt viðkvæmar upplýsingar koma til málið.

Reglurnar í kapittul 8 um at heinta inn og lata víðari trúnaðarupplýsingar hava eisini eina áseting, ið merkir, at ein myndugleiki sum hevur rætt til at lata víðari eina upplýsing sæmbært reglunum í § 27, eisini hevur skyldu til hetta tá ein annar myndugleiki biður um tað, og tað er av týdningi fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka, at upplýsingin verður fingin.

Viðlagt fylgja ummælir til lógaruppskotið frá Føroya Kommunufelag og Sjúkrahússtjóranum.

Felagsálit

í

Løgtingsmáli nr. 92/1991: Fyrisitingarlóg, nr. 93/1991: Lóg um innlit í fyrisitingina, og nr. 142/1991: Løgtingsins umboðsmaður.

Málini nr. 92/1991: Fyrisitingarlóg og nr. 93/1991: Lóg um innlit í fyrisitingina eru løgd fram av landsstýrinum tann 20. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 26. februar 1992 beind í rættarnevndina. Málið nr. 142/1991: Løgtingsins umboðsmaður er lagt fram av tjóðveldisflokkinum 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1992 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini, men er undir viðgerðini komin til ta fyribils niðurstøðu, at nevndini tørvar meiri tíð til at gera viðgerðina lidna. Út frá hesum mælir nevndin til at rættarnevndin verður gjørd til millumtinganevnd hesum trimum tingmálum viðvíkjandi, og setir tí fram fylgjandi uppskot til samtyktar:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at rættarnevndin verður millumtinganevnd í tingmálinum nr. 92, 93 og 142/1991, og leggur álit fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni.

93. Lóg um innlit í fyrisitingina

Uppskot

til

Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Kap. I. Lógarøkið

§ 1.

Lógin er galdandi fyri alt virksemi hjá almennu fyrsitingini undir heimastýrinum, jbr. tó §§ 2 og 3.

Stk. 2. Lógin er eisini galdandi fyri interkommunalar felagsskapir.

Stk. 3. Landsstýrið kann áseta reglur um, at lógin skal verða galdandi fyri nærri ásett feløg, stovnar, felagsskapir v.m., sum ikki kunnu roknast til ta almennu fyrisitingina. Hetta er tó bert galdandi um útreiðslurnar av teirra virksemi í høvuðsheitunum verða rindaðar av landi ella kommunu, ella í tann mun tey við ella sambært lóg hava fingið heimild til at taka avgerð vegna land ella kommunu.Landsstýrið kann herundir áseta nærri reglur um varðveitslu v. m. av skjølum.

§ 2.

Fyri mál um setan í starv ella flytan í hægri starv, er bert ásetingin í § 6 galdandi.

Stk. 2. Lóggávumál, herundir játtanarlógir, koma bert undir lógina, tá lógaruppskot er framlagt í løgtinginum.

Lagtingslov om offentlighed i forvaltningen.

Kap. 1. Lovens område.

§ 1.

Loven gælder for al virksomhed, der udøves af den offentlige forvaltning under hjemmestyret, jfr. dog §§ 2 og 3.

Stk. 2. Loven gælder endvidere for interkommunale fællesskaber.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler om, at loven skal gælde for nærmere angivne selskaber, institutioner, foreninger m.v., som ikke kan henregnes til den offentlige forvaltning. Det gælder dog kun såfremt udgifterne ved deres virksomhed overvejende dækkes af land eller kommune, eller i det omfang de ved eller i henhold til lov har fået tillagt beføjelse til at træffe afgørelser på vegne af land eller kommune. Landsstyret kan herunder fastsætte nærmere regler om opbevaring m. v. af dokumenter.

§ 2.

For sager om ansættelse eller forfremmelse i det offentliges tjeneste gælder kun bestemmelsen i § 6.

Stk. 2. Sager om lovgivning, herunder bevillingslove, er kun omfattet af loven, for så vidt lovforslag er fremsat i lagtinget.

§ 3.

Landsstýrið kann áseta reglur um, at nærri tilskilaðir myndugleikar, málsøki ella sløg av skjølum, fyri hvørji ásetingarnar í §§ 7-14 vanliga føra við sær, at áheitan um skjalainnlit kann verða noktað, skulu verða undantikin lógini.

Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um, at tað aftan á eitt ávíst áramál skal vera loyvt at gera seg kunnigan við nærri tilskilað skjøl, sum ikki koma undir rættin til skjalainnlit sambært reglunum í hesi lóg.

Kap. 2. Rætturin til skjalainnlit.

§ 4.

Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v. m.

Stk. 2. Hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, kann við teimum undantøkum, ið nevnd eru í §§ 7-11 og § 14 krevja, at fáa høvi til, at gera seg kunnigan við upplýsingarnar. Hetta er tó ikki galdandi í tann mun tey fyrilit, ið nevnd eru í § 13, ella umhugsni fyri honum sjálvum, ella øðrum, avgjørt tala ímóti hesum.

Stk. 3. Áheitan sambært stk. 1 og 2 skal skila til tey skjøl ella tað mál, sum

§ 3.

Landsstyret kan fastsætte regler om, at nærmere angivne myndigheder, sagsområder, eller arter af dokumenter, for hvilke bestemmelserne i §§ 7-14 i almindelighed vil medføre, at begæring om aktindsigt kan afslås, skal være undtaget fra loven.

Stk 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at der efter et vist åremål skal være ret til at blive gjort bekendt med nærmere angivne dokumenter, der ikke er undergivet retten til aktindsigt efter reglerne i denne lov.

Kap. 2. Retten til aktindsigt.

§ 4.

Enhver kan med de undtagelser, der er nævnt i §§ 7-14 forlange at blive gjort bekendt med dokumenter, der er indgået til eller oprettet af en forvaltningsmyndighed som led i administrativ sagsbehandling i forbindelse med dens virksomhed. En forvaltningsmyndighed kan give aktindsigt i videre omfang, medmindre andet følger af regler om tavshedspligt m. v.

Stk. 2. Den, hvis personlige forhold er omtalt i et dokument, kan med de undtagelser, der er nævnt i §§ 7-11 og § 14 forlange at blive gjort bekendt med oplysningerne herom. Det gælder dog ikke i det omfang de hensyn, der nævnt i § 13, eller hensynet til den pågældende selv eller andre med afgørende vægt taler imod.

Stk. 3. Begæring efter stk. 1 og 2 skal angive de dokumenter eller den

viðkomandi ynskir at gera seg kunnigan við.

§ 5.

Rætturin til skjalainnlit fevnir um

1) øll skjøl, ið viðvíkja málinum, herundir makaskjøl av teimum skjølum, sum eru send frá myndugleikanum, tá skrivini mugu haldast at vera komin fram til móttakaran, og
2) innføringar í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi skjølum í avvarðandi máli.

Stk. 2. Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, tó burtursæð frá skrásetingum, sum nevndar eru í stk. 1, nr. 2.

Stk. 3. Landsstýrið kann ásetа reglur um atgongd hjá almenninginum at kunna seg við upplýsingar í edv-skráum v.m., ið ikki eru umfataðar av lógini um skráir hjá almennum myndugleikum. Herundir kunnu eisini ásetast reglur um gjald.

Skylda at skriva upp v. m.

§ 6.

Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum verufigu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnigur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum. Hetta er tó ikki galdandi um upp-

sag, som den pågældende ønsker at blive gjort bekendt med.

§ 5.

Retten til aktindsigt omfatter

1) alle dokumenter, der vedrører sagen, herunder genpart af de skrivelser, der er udgået fra myndigheden, når skrivelserne må antages at være kommet frem til adressaten, og
2) indførelser i journaler, registre og andre fortegnelser vedrørende den pågældende sags dokumenter.

Stk. 2. Retten til aktindsigt omfatter ikke registre eller andre systematiserede fortegnelser, hvor der gøres brug af elektronisk databehandling, dog hortset fra fortegnelser som nævnt i stk. 1, nr. 2.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler om offentlighedens adgang til at blive gjort bekendt med oplysninger i edb-registre m. v., der ikke er omfattet af loven om offentlige myndigheders registre. Der kan herunder fastsættes regler om betaling.

Notatpligt m. v.

§ 6.

I sager, hvor der vil blive truffet afgørelse af en forvaltningsmyndighed, skal en myndighed, der mundtligt modtager oplysninger vedrørende en sags faktiske omstændigheder, der er af betydning for sagens afgørelse, eller som på anden måde er bekendt med sådanne oplysninger, gøre notat om indholdet af oplysningerne. Dette gælder dog ikke så-

lýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum.

Stk. 2. Landsstýrið kann fyri nærri ásett fyrisitingarøki áseta reglur um varðveitslu v. m. av fráboðanum, ið eru gjørdar ella móttiknar við edv.

Stk. 3. Landsstýrið kann áseta reglur um uppskrivingarskyldu viðvíkjandi nærri ásettum bólkum av málum um útinnan av øðrum fyrisitingarvirksemi enn nevnt í stk. 1.

Kap. 3.

Undantøk frá reglunum um skjalainnlit. Undantøka av innanhýsis arbeiðsskjølum.

§ 7.

Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru:

1) skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu
2) brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og
3) brævaskifti millum eitt bý- ella bygdaráð og tess nevndir, deildir og aðrar stovnar ella millum hesar stovnar sínámillum.

§ 8.

Rætturin til skjalainnlit fevnir hóast ásetingina í § 7 um innanhýsis arbeiðsskjøl, ið eru til skjals í endaligum líki, tá

fremt oplysningerne i øvrigt fremgår af sagens dokumenter.

Stk. 2. Landsstyret kan for nærmere angivne områder af forvaltningsvirksomhed fastsætte regler om opbevaring m. v. af meddelelser, der udfærdiges eller modtages ved hjælp af elektronisk databehandling.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler om notatpligt for nærmere angivne grupper af sager om udøvelse af anden forvaltningsvirksomhed end nævnt i stk. 1.

Kap. 3.

Undtagelser fra retten til aktindsigt. Undtagelse af interne arbejdsdokumenter.

§ 7.

Retten til aktindsigt omfatter ikke en myndigheds interne arbejdsdokumenter. Som interne arbejdsdokumenter anses:

1) dokumenter, der udarbejdes af en myndighed til eget brug.
2) brevveksling mellem forskellige enheder inden for samme myndighed,
3) brevveksling mellem et by eller bygderåd og dettes udvalg, afdelinger og andre organer eller mellem disse organer indbyrdes.

§ 8.

Retten til aktindsigt omfatter uanset bestemmelsen i § 7 interne arbejdsdokumenter, som foreligger i endelig form, når

1) skjølini bert endurgeva innihaldið av endaligu støðntakan myndugleikans viðvíkjandi avgerðini í einum máli,
2) skjølini bert innihalda eina endurgeving av upplýsingum, sum myndugleikin hevur havt skyldu til at skriva upp sambært ásetingini í § 6,
3) skjølini eru sjálvstøðug skjøl, ið eru gjørd av einum myndugleika fyri at fáa til vega prógvandi ella annan samsvarandi greidleika viðvíkjandi teimi veruligu umstøðunum í einum máli, ella
4) skjølini innihalda almenn stevnumið fyri viðgerðina av ávísum málsløgum.

1) dokumenterne alene gengiver indholdet af myndighedens endelige beslutning vedrørende en sags afgørelse,
2) dokumenterne alene indeholder en gengivelse af oplysninger, som myndigheden har haft pligt til at notere efter bestemmelsen i § 6,
3) dokumenterne er selvstændige dokumenter, der er udarbejdet af en myndighed for at tilvejebringe hevismæssig eller anden tilsvarende klarhed med hensyn til en sags faktiske omstændigheder, eller
4) dokumenterne indeholder generelle retningslinier for behandlingen af bestemte sagstyper.

§ 9.

Um sjúkrahúsjournalur er gjørdur um heilsuviðurskiftini hjá einum persóni, hevur hann hóast ásetingina í § 7 rætt til skjalainnlit í journalina.

Stk. 2. Rætturin til skjalainnlit kann tó avmarkast, í tann mun áhugi partanna í skjalainnliti má metast at eiga at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri pørtunum sjálvum ella øðrum privatum áhugamálum. Undantøka av øðrum skjølum.

§ 9.

Den, om hvis helbredsforhold der er udarbejdet en sygehusjournal, har uanset bestemmelsen i § 7 ret til aktindsigt i journalen.

Stk. 2. Retten til aktindsigt kan dog begrænses i det omfang, partens interesse i aktindsigt findes at burde vige for afgørende hensyn til den pågældende selv eller til andre private interesser. Undtagelse af andre dokumenter.

§ 10.

Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um

1) Gerðabøkur hjá landsstýrinum, frásagnir frá fundum millum landsstýrismenn og skjøl, ið verða gjørd av einum myndugleika til nýtslu á sovorðnum fundum.

§ 10.

Retten til aktindsigt omfatter ikke

1) landsstyrets protokoller, referater af møder mellem landsstyresmænd og dokumenter, der udarbejdes af en myndighed til brug for sådanne møder.

2) Brævaskifti millum landsstýrismenn um lóggávu, herundir játtanarlógir.
3) Skjøl, sum verða send øðrum myndugleika í samband við, at ein myndugleiki hevur skrivarauppgávuna um hendi fyri ein annan myndugleika.
4) Brævaskifti hjá einum myndugleika við serkøn til nýtslu í rættarmálum, ella tá støða skal takast til møguligt rættarmál.
5) Tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum ella vísindaligum kanningum.

Fráboðan av veruligum upplýsingum.

§ 11.

Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av §§ 7 og 10. nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar.

Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um, at skyldan sambært stk. 1 ikki skal vera galdandi fyri nærri ásettar bólkar av málum um útinnan av veruligum fyrisitingarvirksemi.

Undantøka av upplýsingum.

§ 12.

Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um

2) Brevveksling mellem landsstyresmænd om lovgivning, herunder lovvilligslove.
3) Dokumenter, der udveksles i forbindelse med, at en myndighed udfører sekretariatsopgaver for en anden myndighed.

4) En myndigheds brevveksling med sagkyndige til brug i retssager eller ved overvejelse af, om retssag bør føres.
5) Materiale, der tilveje bringes som grundlag for udarbejdelse af offentlig statistik eller videnskabelige undersøgelser.

Meddelelse af faktiske oplysninger.

§ 11.

Oplysninger i dokumenter, der er omfattet af §§ 7 og 10, nr. 1—4, om faktiske omstændigheder, der er af væsentlig betydning for sagsforholdet, skal uanset disse bestemmelser meddelses i overensstemmelse med lovens almindelige regler.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at pligten efter stk. 1 ikke skal gælde nærmere angivne grupper af sager om udøvelse af faktisk forvaltningsvirksomhed.

Undtagelse af oplysninger

§ 12.

Retten til aktindsigt omfatter ikke oplysninger om

1) privatu, fíggjarligu viðurskiftí hjá einstaklingum,
2) tøkniligar útbúningar ella mannagongdir ella um rakstrar- ella vinnuviðurskiftí ella líknandi, um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persón ella virki, sum upplýsingin viðvíkur, at áheitanin ikki verður gingin á møti.

Stk. 2. Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hann verða kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum.

1) enkeltpersoners private, herunder økonomiske forhold,
2) tekniske indretninger eller fremgangsmåder eller om drifts- eller forretningsforhold eller lignende, for så vidt det er af væsentlig betydning for den person eller virksomhed, oplysningen angår, at begæringen ikke imødekommes.

Stk. 2. Omfattes kun en del af et dokument af bestemmelsen i stk. 1, skal den pågældende gøres bekendt med dokumentets øvrige indhold.

§ 13.

Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun, tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi

1) trygd ella verju ríkisins
2) uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum áhugamálum, viðurskiftini við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar,
3) fyribyrging, avdúkan og søkjan at lógarbrotum, revsingarfullgerð og líknandi og verju av ákærdum, vitnum ella øðrum í málum um revsi- ella agasókn,
4) fremjing av almennum eftirliti, skipanar- ella ráðleggingarvirksemi ella ætlaðum tiltøkum sambært skatta- og avgjaldslóggávuni,
5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella

§ 13.

Retten til aktindsigt kan begrænses i det omfang, det er nødvendigt til beskyttelse af væsentlige hensyn til

1) rigets sikkerhed eller forsvar,
2) udenrigspolitiske eller udenrigsøkonomiske interesser, herunder forholdet til fremmede magter eller mellemfolkelige institutioner,
3) forebyggelse, opklaring og forfølgning af lovovertrædelser, straffuldbyrdelse og lignende samt beskyttelse af sigtede, vidner eller andre i sager om strafferetlig eller disciplinær forfølgning,
4) gennemførelse af offentlig kontrol, regulerings- eller planlægningsvirksomhed eller af påtænkte foranstaltninger i henhold til skatte- og afgiftslovgivningen,
5) det offentliges økonomiske interesser, herunder udførelsen af det offentliges forretningsvirksomhed, eller

6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið

Stk. 2. Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum.

6) private og offentlige interesser, hvor hemmeligholdelse efter forholdets særlige karakter er påkrævet.

Stk. 2. Gør hensyn som nævnt i stk. 1 sig kun gældende for en del af et dokument, skal den pågældende gøres bekendt med dokumentets øvrige indhold.

Atlitið til tagnarskyldu.

§ 14.

Skyldan at lata upplýsingar er avmarkað av serstøkum ásetingum um tagnarskyldu, ið eru ásettar við lóg ella við heimild í lóg fyri persónar, ið virka í almennari tænastu ella starvi. Hetta er ikki galdandi viðvíkjandi tí vanligu tagnarskylduni sambært revsilógini, fyrisitingarlógini og tænastumannalóggávuni.

Kap. 4.

Viðgerðin og avgerðin viðvvíkjandi áheitan um skjalainnlit.

§ 15.

Verður áheitan um skjalainnlit sett fram viðvíkjandi skjølum, ið eru partur av máli, har sum tað er ella ferð at verða tikin avgerð av einum fyrisitingarmyndugleika, avger hesin myndugleikin, um áheitanin kann verða gingin á møti. Í øðrum førum verður avgerð um skjalainnlit tikin av tí myndugleika, sum hevur skjalið undir hond.

Stk. 2. Avgerðir um spurningar um skjalainnlit kunnu kærast framíhjá til tann myndugleika, sum er kærustovnur

Forholdet til tavshedspligt.

§ 14.

Pligten til at meddele oplysninger er begrænset af særlige bestemmelser om tavshedspligt fastsat ved lov eller med hjemmel i lov for personer, der virker i offentlig tjeneste eller hverv. Det gælder ikke, for så vidt angår den almindelige tavshedspligt efter straffeloven, forvaltningsloven og tjenestemandslovgivningen.

Kap. 4.

Behandlingen af afgørelsen af begæringer om aktindsigt.

§ 15.

Fremsættes der begæring om aktindsigt vedrørende dokumenter, der indgår i en sag, hvori der er eller vil blive truffet afgørelse af en forvaltningsmyndighed, afgør denne myndighed, om begæringen kan imødekommes. I andre tilfælde afgøres sager om aktindsigt af den myndighed, der har dokumentet i sin besiddelse.

Stk. 2. Afgørelser om aktindsigtsspørgsmål kan påklages særskilt til den myndighed, som er klageinstans i

viðvíkjandi avgerðini ella viðgerðini annars av tí máli, sum áheitanin um skjalainnlit viðvíkir.

Stk. 3. Landsstýrið kann áseta reglur, ið frávikja reglunum í stk. 1 og 2.

§ 16.

Viðkomandi myndugleiki ger sum skjótast av, um ein áheitan um skjalainnlit kann verða gingin á møti, og um hann, sum er komin við áheitanini skal verða gjørdur kunnugur við skjøl soleiðis, at hann fær høvi til at siggja tey á staðnum ella soleiðis, at hann fær eitt avrit ella makaskjal.

Stk. 2. Er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá, um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Stk. 3. Landsstýrið ásetir reglur um gjald fyri avrit ella makaskjøl.

Kap. 5. Gildiskoma, atlitið til aðra lóggávu v.m.

§ 17.

Lógin kemur í gildi 1. januar 1993.

Stk. 2. Lógin er ikki galdandi fyri skjøl, sum ein myndugleiki hevur gjørt, ella sum eru komin einum myndugleikat í hendi áðrenn 1. januar 1993. Upplýsingar um vernligar umstøður, ið eru at finna í tílíkum skjølum, eru tó umfataðar av rættinum til skjalainnlit sambært reglunum í hesi lóg, um so er, at

forhold til afgørelsen eller behandlingen i øvrigt af den sag, begæringen om aktindsigt vedrører.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser, der fraviger reglerne i stk. 1 og 2.

§ 16.

Vedkommende myndighed afgør snarest, om en begæring kan imødekommes, og om den, der har fremsat begæringen, skal gøres bekendt med dokumenterne ved, at der gives adgang til gennemsyn på stedet, eller ved, at der udleveres en afskrift eller kopi.

Stk. 2. Er en begæring om aktindsigt ikke imødekommet eller afslået inden 10 dage efter, at den er modtaget af vedkommende myndighed, skal myndigheden underrette den begærende om grunden hertil samt om, hvornår en afgørelse kan forventes at foreligge.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter regler om betaling for afskrifter og kopier.

Kap. 5. Ikrafttræden, forholdet til anden lovgivning m.v.

§ 17.

Loven træder i kraft 1. januar 1993.

Stk. 2. Loven gælder ikke for dokumenter, der er udfærdiget af en myndighed eller som er kommet i en myndigheds besiddelse inden 1. januar 1993. Oplysninger om faktiske omstændigheder, der indeholdes i sådanne dokumenter, er dog omfattet af retten til aktindsigt efter reglerne i denne lov, hvis

skjølini eru komin til eitt mál, sum er ella hevur verið til viðgerðar hjá einum fyrisitingarmyndugleika aftaná nevnda dag, og upplýsingarnar eru ella hava verið av týdningi fyri málið, ásetingin í § 8, nr. 4 er galdandi fyri skjøl, ið verða nýtt aftaná, at lógin er komin í gildi. Ásetingin í § 9 er galdandi fyri sjúkrahúsjournalar, ið eru gjørdar aftaná, at lógin er komin í gildi, og er eisini galdandi fyri tað, sum er skrivað í verandi journalar aftaná, at lógin er komin í gildi. Høvið til skjalainnlit sambært § 1, stk. 2 er ikki galdandi fyri skjøl, ið eru gjørd av ella eru komin til tey í ásetingini nevndu feløg, stovnar, felagsskapir v.m., áðrenn lógin er komin í gildi.

Stk. 4. Ásetingar í øðrum lógum um høvi til at kunna seg við skjøl hjá almennu fyrisitingini vera í gildi, hóast tær geva teprari rætt til skjalainnlit enn henda lóg.

dokumenterne er indgået i en sag, der er eller har været under behandling af en forvaltningsmyndighed efter det nævnte tidspunkt, og oplysningerne er eller har været af betydning for sagen. Bestemmelsen i § 8, nr. 4 gælder for dokumenter, der anvendes efter lovens ikrafttræden. Bestemmelsen i § 9 gælder for sygehusjournaler oprettet efter lovens ikrafttræden og for tilførsler til eksisterende journaler, der er foretaget efter lovens ikrafttræden. Adgangen til aktindsigt efter § 1, stk. 2 gælder ikke for dokumenter, der er udfærdiget af eller er indkommet til de i bestemmelsen nævnte selskaber, institutioner, forening m.v. før lovens ikrafttræden.

Stk. 4. Bestemmelser i andre love om adgang til at blive gjort bekendt med dokumenter hos den offentlige forvaltning opretholdes, uanset om de giver ret til aktindsigt i snævrere omfang end denne lov.

Viðmerkingar:

Í 1987 heitti Føroya Blaðmannafelag á landsstýrið um at seta í gildi løgtingslóg um innlit í fyrisitingina. Hetta uppskot bygdi á gomlu donsku lógina um alment innlit í fyrisitingina. Henda lóg fór úr gildi í Danmark 1. januar 1987, tá hon var avloyst av einari nýggjari lóg um innlit í fyrisitingina og einari lóg um fyrisiting, sum báðar hingu saman.

Í 1990 varð málið framlagt í løgtinginum av Sjálvstýrisflokkinum. Landsstýrið førdi tá fram, at arbeitt var í landsstýrinum við hesum spurningi, og samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fram lógaruppskot um innlit í fyrisitingina.

Tá landsstýrið fór í holt við at gera reglur fyri økið almenn fyrisiting, varð mett, at best var at fáa reglur fyri alt økið, tí hóast hetta óivað førir nakað meirarbeiði við sær, so verður trygdin hjá borgarunum nógv betur, og sleppur fyrisitingin frá nógvum ivaspurningum, tí klárar reglur koma á økinum.

fyrtiliggjandi uppskot, t. e. uppskot til løgtingslóg um fyrisiting og uppskot til løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, eru samantengd soleiðis, at ikki ber til at samtykkja annað, men ikki hitt.

94. Býti av prísískoyti, rakstrar- og manningarstudningi til útróðrarbátar

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum (Lønjavningargrunninum) at ansa eftir, at prísískoyti, rakstrar- og manningarstudningur verður býttur á sama hátt, sum hesi vóru býtt fyri 1. januar 1992.

Viðmerkingar:

Longu tá ið allir studningar vóru lagdir saman í eitt prísískoyti, varð ávarað móti hesum, at manningin tá fór at fáa minni í sín part.

Sjálvt um løgtingslógin um leingjan av ávísum lønarsáttmálum nr. 5 frá 23. januar 1992 í § 3 greitt sigur, at studningarnir verða býttir sum fyri 1. januar 1992, so eru avreiðingarseðlarnir broyttir og studningarnir býttir í helvt, soleiðis at manningin fær væl minni í sín part.

Tað mai huldast verða skylda landsstýrisins gjøgnum lønjavningargrunnin at ansa eftir, at rætt verður farið fram, áðrenn studningarnir verða endurgoldnir.

Tí verður hetta uppskotið sett fram:

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 94/1991: Býti av prísískoyti, rakstrar- og manningarstudningi til útróðrarbátar.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 20. februar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannesen, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen, Jógvan Ingvard Olsen og Heini O. Heinesen) vísir á, at ásett er við løgtingslóg nr. 5 frá 23. januar 1992 um leingjan av ávísum lønarsáttmálum, hvussu prísískoyti skal býtast. Málið er sostatt avgreitt av løgtinginum. Eisini vísir meirilutin á, at Meginfelag Útróðrarmanna hevur sáttmála um avroknингar fyri útróðrarnetum. Meirilutin tekur tí ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) vísir á, at á avreiðingarseðlum stendur nú bert tann samlaði prísurin, ið latin verður fyri fiskin, og tekur tí undir við máliaum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki.

95. Løgtingslóg um lán til Jarðargrunnin

Uppskot

til

Løgtingslóg um lán til Jarðargrunnin.

§ 1.

Jarðarráðnum er heimilað Jarðargrunnsins vegna at læna upp til 20 mió. kr. at nýta til útlán eftir reglunum í lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 um landbúnaðarins frama.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Lagtingslov om lån til jordfonden.

§ 1.

Landbrugsrådet bemyndiges til på jordfondens vegne at optage lån op til 20 mio. kr. at benytte til udlån efter reglerne i lov nr. 174 af 24. maj 1937 til landbrugets fremme.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Útlánsorka grunsins er minkandi, og er tí tørvurin á lániheimild enn størri, enn hann hevur verið.

Hetta skyldast m.a., at jarðarsølan, serliga til kommunur, er minkað - t.d. minkaði sølan frá 1989 til 1990 úr 14 mió. kr. niður í 3,5 mió. kr. eftir 2 árum.

Leggjast kann aftrat, at tað verður neyvan lættari at fáa fallin gjøld inn, enn tað hevur verið.

Av uppgávum, sum liggja fyri, er at taka støðu til í fyrsta lagi fígging til útbygging á Mjólkarvirki Búnaðarmanna fyri mettan kostnað 20 mió. kr.

Av tí at MBM leggur seg eftir at framleiða ymisk sløg av mjólkarúrdráttum - tó ikki smør og ost - er tørvurin á plássi og útgerð nógv størri enn hjá mjólkarvirkjum aðrastaðni, har hvørt einstakt virki sær hevur specialiserað seg til at framleiða eina ella heilt fáar vørur úr mjólkini.

Tann stóri vøksturin í mjólkarframleiðsluni - meting fyri 1991 6.375.000 litrar - setir eisini síni krøv til meira pláss.

Í hesum sambandi skal upplýsast, at Jarðarráðið hevur samtykt ikki at fara undir fleiri fløgur til nýggj fjós, fyrr enn betri greiða fæst á, hvørjum støði framleiðslan fer at vera í eisini íroknað teimum uml. 50 básunum, sum eru í gerð.

Kjøthús Búnaðarmanna, møguliga í øðrum líki enn tí áður er kunnað landsstýrinum, kemur eisini at hava fígging fyri neyðini.

Annars skal nevnast vanliga lánivirksemi grunsins til velting, maskinur o.a., eisini at umsóknir um fígging til seyðahús fyri uml. 10 mió. kr. higartil ikki eru játtaðar, orsakað av kapitaltørvi.

Um játtanin til rentustudning ikki verður hægri, enn landsstýrið hevur skotið upp, verður neyðugt at hækka útlánsrentu grunsins heilt ella partvíst.

Sum støðan er, metir landsstýrið, at hesar 20 mió. kr. eiga at verða lættar út við hægri rentu.

Álit

I

Løgtingsmáli nr. 95/1991: Løgtingslóg um lán til Jarðargrunnin.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. februar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 28. mars 1992 beint í fíggjarnevndina.

Formaðurin fyri stýrið fyri Jarðargrunnin, grannskoðarin og stjórin fyri ráðið vóru á fundi og greiddu nevndini frá støðuni.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Flemming Mikkelsen) vísir á, at, sum búskaparliga støðan er í samfelagnum, eru tað óráð at overva landskassan við meiri lánum, uttan at tað er átrokandi neyðugt, og kann tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins.

96. Val av álitismonnum og nevndum

Flogleiðir - Holdingfelagið
Sbrt. viðtøkunum § 12: løgtingið velur
2 limir í 7-mannanevnd hvørt ár:

1991 24/4:	**1992 / :**
Fastir limir:	*Fastir limir:*
Leivur Johannesen, Tórshavn,	1.
Carlo Joensen, Miðvági.	2.
Tiltakslimir:	*Tiltakslimur:*
Jan Poulsen, Sumba	1.
Jóan Jakki Heinesen, Sørvág	2.

Flogsamhand Føroya **1992 / :**
umboðsmaður á aðalfundi:
Hvørt ár
1991 24/4:
Anfinn Kallsberg, Viðareiði

Føroya Sparikassi **1992 / :**
grannskoðari, hv. ár.:
Seinast: : 24/4 91:
Roymar Lamhauge,
Korkagøta 11, Tórshavn,

Kirkjustjórnin
Sambært lóg nr. 109 frá 29/3 1924, § 2,
3 limir úr løgtinginum, hvørt ár:
Seinast:

1988 6/5:	**1992 / :**
Sóni í Hjøllum, Toftir,	1.
Torkil Beder, Fuglafjørður	2.
Agnar Nielsen, Vestmanna.	3.

Kommunali Lánsgrunnurin
2 limir og 2 tiltakslmir í nevndina fyri 4 ár, sbrt. løgtingslóg nr. 75 frá 9. 6. 1988:

Seinast:	
1988, 6/9:	**1992 / :**
Fastir Limir:	*Fastir limir:*
Eyðun Viderø	1.
Heini O. Heinesen	2.
Tilstakslimir:	*Tiltakslimir:*
Martin Nielsen,	1.
Øssur av Steinum	2.

Landsbanka Føroya -
3 limir í umsjónarráðið valdir av løgtinginum:

Seinast	
1987 3/8:	**1992 / :**
Manne Næs, Hvalba,	1.
Andreas Guttorm Djurhuus, Tórshavn	2.
Poul Michelsen, Tórshavn	3.

Løgtiugsvalnevndir -
sbr. løgtingslóg nr. 49 frá 20/7 1978 § 12 og kunngerð:
3 limir + 3 tiltakslimir 4. hv. ár fyri hvørt valdømi, sí kunngerð 107, 12/9 1988:

A. Suðurstreymoyar valdømi:	**A. Suðurstreymoyar valdømi:**
a. Fastir limir:	*a. Fastir limir:*
Per Gaard, Tórshavn,	1.
Trygvi Árting,	2.
Herman í Stórustovu, Tórshavn	3.
b. Tiltakslimir:	*b. Tiltakslimir:*
Gordon Johannesen, Tórshavn,	1.
Jógvan A. Skaale, Tórshavn,	2.
Niels Debes, Tórshavn,	3.

B. Norðstreymoyar valdømi:
a. Fastir limir:
Heini Johansen, Vestmanna
Jákup Joensen, Kvívík
Hanus Joensen, Hvalvík.

b. Tiltakslimir:
Sanna í Gerðinum, Vestmanna
Ólavur Jacobsen, Kvívík,
Jarvild Jacobsen, Vestmanna.

C. Eysturoyar valdømi:
a. Fastir limir:
Petur Eli Mikkelsen, Syðrugøtu
Arnold Abrahamsen, Fuglafj.
Herluf Berthelsen, Fuglafj.

b. Tiltakslimir:
Hans J. Lamhauge, Lamba,
Margeir Tollegaard, Fuglafj.
Jákup Lamhauge, Glyvrar

D. Norðoya valdømi:
a. Fastir limir:
Mikael Matras, Klaksvík
Margit Joensen, Klaksvík
Jósup Henriksen, Klaksvík

b. Tiltakslimir:
Álvur Zachariassen, Klaksvík
Jógvan Ósá, Klaksvík

E. Vága valdømi:
a. Fastir limir:
Sigfríð Olsen, Sandavág
Niels Marni Petersen, Sandavág
Kristianna á Lofti, Sandavág

B. Norðstreymoyar valdømi:
a. Fastir limir:
1.
2.
3.

b. Tiltakslimir:
1.
2.
3.

C. Eysturoyar valdømi:
a. Fastir limir:
1.
2.
3.

b. Tiltakslimir:
1.
2.
3.

D. Norðoya valdømi:
a. Fastir limir:
1.
2.
3.

b. Tiltakslimir:
1.
2.
3.

E. Vága valdømi:
a. Fastir limir:
1.
2.
3.

b. Tiltakslimir:	*b. Tiltakslimir:*
Winther Lauritzen, Sørv.	1.
Jóhan á Ørg, Sørvágur,	2.
Jógvan H. Joensen, Miðvág.	3.
F. Sandoyar valdømi:	**F. Sandoyar valdøni:**
a. Fastir limir:	*a. Fastir limir:*
Bjarni Dalsgaard, Skálav.	1.
Sólrun Christiansen, Skálav.	2.
Birgit Hentze, Skopun	3.
b. Tiltakslimir:	**b. Tiltakslimir:**
Sámal P. Hentze, Skopun,	1.
Jørmund Olsen, Húsavík,	2.
Palli Olsen, Skálavík.	3.
G. Suðuroyar valdømi:	**G. Suðuroyar valdøni:**
a. Fastir limir:	*a. Fastir limir:*
Eilif Lisberg, Tvøroyri	1.
Árni Brattaberg, Vági	2.
Ásgerð Stenberg, Vági	3.
b. Tiltakslimir:	*b. Tiltakslimir:*
Jákup Berthelsen, Tvøroyri	1.
Jákup Mortensen, Tvøroyri	2.
Oleanna Michelsen, Tvøroyri	3.

Nevningargrundlistum - Nevnd viðv. Sbrt. rættargangslógini nr. 92 frá 23/2 1988, C 199, 26/9 1967: Eftir hvørt løgtingsval.
Seinast:

1989 15/4:	**1992 / :**
Suðuroyar sýsla:	**Suðuroyar sýsla:**
Áki Dímun, 800 Tvøroyri	1.
David Bech, 950 Porkeri	2.
Poul Johs, Poulsen, 970 Sumba	3.

Tórleivur Augustiniussen, 900 Vági	4.
Tiler Djurhuus, sýslumaður 800 Tvøroyri.	5.

Sandoyar sýsla:	**Sandoyar sýsla:**
Anna Horn, 210 Sandi.	1.
Palle Dalsgaard, 220 Skálavík.	2.
Jørmund Olsen, 230 Húsavík,	3.
Louis Eystberg, 240 Skopun.	4.

Streymoyar sýsla:	**Streymoyar sýsla:**
Tórstein Grækarisson, Kvívík.	1.
Albert Hansen, Háskúlavegur 13, 100 Tórshavn,	2.
Kristian á Dul, Støðlagøta 2a, 160 Argir.	3.
Noomi Juul, Dalagøta 22, 100 Tórshavn.	4.
Óla Jákup Gaard Olsen, 350 Vestmanna.	5.

Vága sýsla:	**Vága sýsla:**
Jónvør Petersen, 386 Bø.	1.
Hans Arni Nielsen, 360 Sandavági.	2.
Frits Jacobsen, 380 Sørvág.	3.
Tórur Skálum, 380 Sørvágur.	4.

Eysturoyar sýsla:	**Eysturoyar sýsla:**
Ámundur Berthelsen, 490 Strendur.	1.
Símun Fornagarð, 530 Kambsdal.	2.
Poul M. Joensen, 530 Fuglafirði.	3.
Anna Berg, 480 Skáli.	4.
Jenny Davidsen, 480 Skáli.	5.

Norðoya sýsla:	**Norðoya sýsla:**
Arne Ziskasen, 700 Klaksvík.	1.
Andreas Andreasen, 700 Klaksvík.	2.
Jóan Magnus W. Høgnesen, 700 Klaksvík.	3.
Johs. Thomsen, 700 Klaksvík.	4.
Sámal Christiansen, 700 Klaksvík.	5.

Realkredittstovnurin
Sambært lóg nr. 60, 12/3 1955 § 5: 2 limir í umboðsmannanevnd, 4. hv. ár.
Seinast:

1988, 6/5:	**1992 / :**
Zacharias Müller, Porkeri,	1.
Jákup Mortensen, Trongisvági.	2.

Sjóvinnubankin
umboðsmaður á aðalfundi hvørt ár
Seinast

1991 24/4	**1992 / :**
Umboðsmaður:	*Umboðsmaður*
Hans Pauli Holm, Tvøroyri	1.
Varamaður:	*Varðamaður*
Eliesar Arge, Tórshavn.	1.

Skipafelagið Føroyar
2 limir í nevndina, hvørt ár
Seinast

1991 24/4	**1992 / :**
Martin Joensen, Tórshavn	1.
Álvur Kirke, Kaldbak	2.

Skipafelagið Føroyar
umboðsmaður á aðalfundi hvørt ár:
Seinast

1991 24/4:	**1992 / :**

Umboðsmaður	**Umboðsmaður**
Dánjal P. Danielsen, Velbast.	
Varamaður:	
Agnar Nielsen, Vestmanna.	

Tryggingarsambandið Føroya
– í umboðsráðið, 4. hv. ár, 7 limir, sbr. løgtingslóg nr. 24. 6/3 1956, § 6.
Seinast:

1988 6/5:	**1992 / :**
Hildur Patursson, Quillingsgarður, 100 Tórshavn.	1.
Bjarni Vestergaard, 900 Vágur.	2.
Dennmus Hentze, Handan Á 7, 100 Tórshavn.	3.
Gutti Petersen, 360 Sandavági.	4.
Tórfinn Smith, Suðumás 10, 100 Tórshavn.	5.
Jógvan I. Olsen, 650 Toftir	6.
Óli Jákup Müller, J.C. Svabosgøta 23, 100 Tórshavn.	7.

97. Broytingar í revsilógini

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 272 frá 3. mai 1989 um broyting í borgarligu revsilógini verður sett í gildi í Føroyum við undantaki av § 1, nr. 1.

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur í skrivi dagfest 7. august 1989 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 272 frá 3. mai 1989 um broyting í borgarligu revsilógini verður sett í gildi í Føroyum.

Lógin kann eftir § 4 setast í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við neyðugum broytingum eftir føroyskum viðurskiftum.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

§ 1, nr.1 (§ 235):
Henda grein skerpir revsirammuna í § 235 um sølu v. m. av barnapornografi, soleiðis sum henda grein er galdandi í Danmark. Í Føroyum eru øll sløg av pornografi forboðin og revsirammin er 6 mánaðir. Sostatt skal henda broyting ikki setast í gildi í Føroyum.

§ 1, nr. 2-3 (§§ 244-246 og §§ 248-249):
Her verða greinirnar í revsilógini um harðskap endurskoðaðar og gjørdar eintýdari. Ætlanin er m. a., at størri munur skal vera á revsingini í ávísum harðskapsmálum og er tað ein fortreyt við lógarbroytingini, at revsingin í grovum harðskapsmálum verður herd.

§ 2, nr. 1:
Her verður § 205 í revsilógini um ólógligt privatdektivvirksemi sett úr gildi. Hetta er ein fylgja av, at sett er í gildi fyri Føroyar lóg nr. 92 frá 23. februar 1988 um m.a. gildiskomu av lóg nr. 63 frá 3. mars 1948 um veiting av løgfrøðiligari hjálp og um innheintingar- og privatdektiv virksemi.

§ 2, nr. 2-3:
Lóg nr. 248 frá 9. juni 1967 um broytingar í borgarligu revsilógini er sett í gildi í Føroyum við undantaki av § 1, nr. 3 og nr. 11. Hetta hendi við kgl. fyriskipan nr. 150 frá 21. mars 1988, har ll ymsar lógir um broytingar í revsilógini vórðu settar í gildi í Føroyum.

Í § 1, nr. 3, í lógini verða reglurnar í revsilógini um fyrning endurskoðaðar. Orsøkin til, at hesin parturin av lógini ikki kom í gildi samstundis sum hin parturin av lógini, komst av lógartekniskum trupulleikum, við tað at Løgmálaráðið ikki metti, at bert partar av broytingunum í fyrningarreglunum kundu setast í gildi. Landsstýrið ynskti ikki, at fyrningarfreistirnar í skattamálum bert skulu vera 5 ár.

Sum lógin nú er orðað, kunnu reglurnar um fyrning setast í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan við t. d. teirri broyting, at fyrningarreglurnar fyri brot á skattalógina verður 10 ár.

Verða lógarbroytingarnar lýstar at galda í Føroyum eftir § 2 nr. 3, verður heimild til við kgl. fyriskipan at áseta, at broytingarnar í lógarreglunum skulu setast í gildi í Føroyum og í hvørjum líki. Uppskot til kgl. fyriskipan skal so eftir vanligari siðvenju leggjast fyri løgtingið til samtyktar.

Lóg nr. 550 frá 22. desember 1971 um broytingar í borgarligu revsilógini er eftir sínum innihaldi ikki galdandi fyri Føroyar og eingin heimild er í lógini til at seta hana í gildi her við kgl. fyriskipan.

Eftir lógini verður ásett fongsulsrevsing upp til 4 ár fyri groft skattasvik og groft brot á tolllóggávuna.

Straffirammurnar í skattalógini og í tolllógini eru 2 ár.

Grundin fyri at tær høgu revsirammurnar fyri brot á skattalóggávuna og tolllóggávuna verða settar í kapittul 28 í sjálvari revsilógini er, at áherðsla eigur at leggjast á, at hesi lógarbrot í ávísum førum mugu metast javnt við onnur lógarbrot eftir kap. 28 í revsilógini um ríkingarbrotsverk (økonomisk kriminalitet)

Verður henda lógarbroyting eisini tikin við, fær heimastýrið møguleika fyri at heita á ríkismyndugleikarnar um við kgl. fyriskipan at áseta, at lógarreglurnar skulu setast í gildi í Føroyum og í hvørjum líki.

Landfútin, ið hevur havt málið til ummælis, mælir til at seta lógina í gildi í Føroyum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 97/1991: Broytingar í revsilógini.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 10. mars 1992 beint í rættarnevndina.

Landsstýrið mælir, í uppskoti til samtyktar, løgtinginum til at samtykkja, at fólkatingslóg nr. 272 frá 3. mai 1989 um ávísar broytingar í borgarligu revsilógini verður sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan.

Broytingin ber í sær m.a. harðari revsing í eitt nú grovum harðskapsmálum. Av øðrum broytingum kunnu nevnast, at fyrning fyri brot á skattalógina verður 10 ár, eins og revsirammun fyri grovt skatta- og tollsvik verður sett upp til 4 ár.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein sand rættarnevnd løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

98. Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrið ásetir nærri reglur um útgjalding úr grunninum."

2) Í § 5 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"Landsstýrið ásetir nærri reglur um røkt av fæi grunsins."

3) § 11, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"§ 3, § 4 og § 5, stk. 1 og 2 fáa gildi 1. januar 1997."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsmarkedspension.

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkedspension foretages følgende ændringer:

1) § 5, stk. 2 affattes således:
"Landsstyret fastsætter nærmere regler om udbetalinger fra fonden."

2) I § 5 bliver indsat som nyt stk. 3:
"Landsstyret fastsætter nærmere regler om forvaltning af fondens kapital."

3) § 11, stk. 4 affattes således:
"§ 3, § 4 og § 5, stk. 1 og 2 træder i kraft 1. januar 1997."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Á vári 1991 samtykti løgtingið lóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum kom í staðin fyri løgtingslógina um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Í januar mánaði í ár byrjaðu inngjaldingarnar til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Sambært lógini skulu útgjaldingarnar byrja 1. januar 1997.

Landsstýrið metir, at ásetingarnar í § 5, stk. 2, jbr. § 11, stk. 4, eru sera óhepnar, við tað at landsstýrið ikki fyrr enn í 1997 skal áseta reglur um røkt av fæi grunsins.

Landsstýrið skjýtur tí upp at broyta lógina soleiðis, at landsstýrið beinanvegin fær heimild at áseta reglur um røkt av fæi grunsins.

Annars kann upplýsast, at fæið hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum í løtuni verður sett í føroysku peningastovnarnar eftir sama býtislykli sum bundna sannansparingin. Peningurin verður rentaður við hægstu innlánsrentu.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 98/1991: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 28. februar 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

99. Veðhald fyri láni til trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir v. m.

Uppskot

til

Løgtingslóg um veðhald fyri láni til trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir v. m.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1992 at veðhalda fyri rakstrarláni til trygdar

Lagtingslov om garanti for lån til garantifonden for fiskeindhandlinger og løn m. v.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1992 at garantere for driftslån til garantifonden for

grunnin fyri avreiðingar og lønir v. m. uppá 1,5 mió. kr.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

fiskeindhandlinger og løn m.v. stort 1,5 mio. kr.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir v. m. hevur heitt á landsstýrið, um at landsstýrið landskassans vegna veðheldur fyri 1,5 mió. kr. í láni til grunnin.

Sum grund fyri áheitanini til landsstýrið verður ført fram, at grunnurin í løtuni ikki er førur fyri at rinda tað, honum er álagt sambært lógini. Krøvini, sum grunnurin skal rinda í næstum, eru uppá 1,2 mió. kr. umframt tey krøv, sum næstan dagliga verða staðfest.

Trygdargrunnurin upplýsir, at hann í dag er í teirri støðu, at krøvini viðvíkjandi arbeiðsgevaragjaldi uppá umr. 6 mió. kr. júst eru send út við eini gjaldsfreist til 1. apríl 1992 og at grunnurin í løtuni hevur umr. 560.000 kr.

Í fjør fekk grunnurin játtað landskassaveðhald fyri láni úr Føroya Sparikassa uppá 3,5 mió. kr. Veðhaldið var galdandi til 31. desember 1991. Støðan í 1991 var tann, at grunnurin ikki hevði fyri neyðini at nýta av kredittinum, men kláraði skyldurnar burturav tí lógarásetta gjaldinum frá arbeiðsgevarunum. Viðmerkjast skal, at arbeiðsgevaragjaldið til grunnin í fjør hækkaði úr 1 o/oo uppí 2 o/oo og er í løtuni 1,5 o/oo.

Í januar mánaði 1990 veðhelt landsstýrið landskassans vegna fyri láni uppá 1,5 mió. kr. til trygdargrunnin. Veðhaldið var effektivt. og er regreskrav landskassans móti grunninum skipað sum lán.

Til tess at loysa gjaldføristrupulleikarnar hjá grunninum skjýtur landsstýrið upp, at landsstýrið landskassans vegna fær heimild til at veðhalda fyri rakstrarláni til Trygdargrunnin fyri Avreiðingar og lønir, og at hetta veðhald er í gildi í fíggjarárinum 1992.

Roknskapir grunsins fyri árini 1988, 1989 og 1990 eru viðlagdir.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 99/1991: Veðhald fyri láni til trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 28. februar 1992 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 9. mars 1992, og var nevndin samd um, at tá landsstýrið í lógaruppskoti sínum í § 1 hevur skotið upp, at veðhaldsheimildin verður "í fíggjarárinum 1992", innber hetta, at um skuldin ikki er afturgoldin 31. desember 1992, verður landskassin tann 1. januar 1993 ábyrgdaður sum skuldari fyri lán sama dag.

Ásannandi, at hetta er ein nakað hart uppsett støða í eini tíð, har landskassanum tørvar pening, heldur ein samd nevnd, at tað er betri fyri allar partar, t. e. peningastovn, lántakara og landskassan at linka um tíðartreytina soleiðis, at peningastovnurin og lántakarin betri kunnu tosa seg til rættis um kreditttviðurskiftini og sostatt avtala um, hvussu langt tíðarskeið, lánið skal ganga.

Tí má møguleiki vera fyri at avtala eitt lánsskeið, sum fer nakað út um endan á álmanakkaárinum, so mikið longri, sum gjaldføri o.a. bendir á, so landskassin er í minni vanda fyri at leggja út pening. Men talan kann sjálvandi ikki vera um avtalur fyri fleiri ár, men eitt upp á seg styttri tíðarskeið, ið passar til best metta fíggjarmynstrið.

Tíðskil setir nevndin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 ganga út orðini " í fíggjarárinum" 1992.

I § 1 udgår ordene " i finansåret 1992."

Við hesi broyting mælir ein samd fíggjarnevnd til at samtykkja fyriliggjandi lógaruppskot.

101. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:

"Hvør persónur, sum kemur undir nr. 1 og sum dvølur uttan fyri Føroyar í bráðfeingi. Tað er bráðfeingisdvøl uttanlands, so leingi tað ikki hevur verið longri enn 4 ár. Tó fellur skattskyldan burtur frá tí degi, viðkomandi kann prógva, at hann hevur skyldu at gjalda inntøkuskatt uttanlands. Tað er tó ein treyt, at skattingin ikki fer fram eftir reglum, sum eru eyðsýnt lagaligari enn skattareglurnar í Føroyum. Føroya Landsstýri avger, um inntøkuskattingin uttanlands má metast sum eyðsýnt lagaligari enn eftir skattareglunum í Føroyum. Avgerðin, um skattingin uttanlands eyðsýnt kann metast sum lagaligari enn eftir skattareglunum í Føroyum, verður tikin út frá eini heildarmetan. Eisini hevur tað týdning fyri metingina, um ein verulig inntøkuskatting fer fram, um inn-

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1, nr. 2 affattes således:

"Enhver person, der er omfattet af nr. 1 og som tager midlertidigt ophold uden for Færøerne. Ophold uden for Færøerne anses som midlertidigt, sålænge det ikke har strakt sig over 4 år. Dog bortfalder skattepligten fra det tidspunkt, fra hvilket den pågældende godtgør at være undergivet indkomstbeskatning udenlands. Det er dog en betingelse, at beskatningen ikke sker efter regler, der er åbenbart lempeligere end reglerne på Færøerne. Færøernes Landsstyre afgør, hvorvidt indkomstskatningen i udlandet må anses som åbenbart lempeligere end efter reglerne på Færøerne. Afgørelsen af hvorvidt, indkomstbeskatningen i udlandet kan anses for åbenbart lempeligere end efter reglerne på Færøerne, foretages på grundlag af en samlet vurdering. Der henses

tøkuskattingin sum meginregla fevnir um allar inntøkur, uttan mun til hvaðani tær stava, og um inntøkuskattingin fer fram eftir reglunum galdandi fyri persónar búsitandi har."

2) § 14, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Til tess, at skattavaldið kann gera av, um ein endalig álíkning skal fara fram, skal búgvið innan 6 mánaðir eftir andlátið láta líkningarráðnum eina uppgerð yvir ogn og skuld við andlátið, og eina uppgerð yvir inntøkur hins deyða frá inntøkuársins byrjan til andlátið. Verður seinni enn 4 mánaðir eftir andlátið avgjørt, hvussu búgvið skal viðgerast, skal uppgerðin tó latast líkningarráðnum innan 2 mánaðir eftir, at avgerðin er tikin."

3) § 29, nr. 10 verður orðað soleiðis:
"sømdarpeningur goldin sambært lóg nr. 93 frá 20. mars 1940 um "udbetaling af hædersgaver til danske sømænd og fiskere og deres efterladte", søndarpeningur sambært lóg nr. 383 frá 9. august 1945 um "visse hædersgaver til danske søfarende og fiskere og deres efterladte", og sømdarpeningur goldin sambært 37- 43 í lóg nr. 475 frá 1. oktober 1945 um "erstatning til besættelsestidens ofre"".

4) Í § 29 verður sum nr. 17 sett:
"gávur, ið stava frá innsavningum, treylað av, at gávan er eingangsveiting og verður latin sum hjálp til persónar, ið hava mist forsyrgj-

tillige til, om en egentlig indkomstbeskatning foretages, om indkomstbeskatningen i princippet omfatter de samlede indtægter, uanset hvorfra de hidrører, og om indkomstbeskatningen sker efter reglerne gældende for derboende personer."

2) § 14, stk. 3 affattes således:
"Boet skal inden 6 måneder efter dødsfaldet indgive en opgørelse til ligningsrådet over aktiver og passiver ved dødsfaldet, samt en opgørelse over afdødes indkomst fra indkomstårets begyndelse til dødsfaldet til afgørelse af, hvorvidt den vil kræve afsluttende ansættelse. Afgøres boets behandlingsmåde senere end 4 måneder efter dødsfaldet, skal opgørelsen dog indgives til ligningsrådet inden 2 måneder efter, at afgørelsen er truffet."

3) § 29, nr. 10 affattes således:
"hædersgaver, udbetalt i henhold til lov nr. 93 af 20. marts 1940 om udbetaling af hædersgaver til danske sømænd og fiskere og deres efterladte, lov nr. 383 af 9. august 1945 om visse hædersgaver til danske søfarende og fiskere og deres efterladte, samt hædersgaver udbetalt i henhold til §§ 37-43 i lov nr. 475 af 1. oktober 1945 om erstatning til besættelsestidens ofre."

4) I § 29 indsættes som nr. 17:
"gaver, der hidrører fra indsamlinger, forudsat at gaven er oppebåret een gang for alle, og ydes som hjælp til personer, der har mistet

ara av vanlukkuávum ella líknandi hendingum."

5) Í § 63, stk. 1 verður skoytt uppi:
"Avrokningarstaðið hevur skyldu til mótvegis skattgjaldaranum at gera eina gjølliga sundurgreinan av, hvat verður eftirhildið í hvørjari A-inntøku. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um sundurgreiningina."

6) § 63, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Persónar, sum ikki eru skrásettir í fólkayvirlitinum, skulu, fyri at A-inntøkur kunnu verða ávístar teimum, skráseta seg hjá fólkayvirlitinum. Í serligum førum kann Líkningarráð Føroya tó geva persónum eftir 1. pkt. fyribils nummarprógv, sum hin ávísingarskyldugi skal nýta í lønarávísing til viðkomandi."

7) Í § 63 verður sum stk. 7 sett:
"Hin ávísingarskyldugi skal í sambandi við hvørja ávísan av A-inntøku, lata løntakaranum skrivliga fráboðan, ið sigur frá navni, bústaði og arbeiðsgevaratali hjá ávísingarskylduga, og navni og persónstali hjá løntakara, lønarskeiði, A-inntøku, mótkrøvum og ikki skattskyldugum veitingum."

8) § 64, pkt. 2 verður strikað.

9) § 75, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Meta líkningarvaldini, at longu goldin fyribilsskattur er munandi hægri enn endaligi skatturin, og tað tykist at vera órímuligt at bíða eftir tí í § 79 ásettu tíð fyri afturg

forsørger i forbindelse med en ulykke eller lignende omstændighed er."

5) § 63, stk. 1 tilføjes:
"Afregningsstedet har overfor skatteyderen pligt til at foretage en nøje specifikation af, hvad der bliver tilbageholdt i hver enkelt A-indkomst. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler vedrørende specifikationen."

6) § 63, stk. 4 affattes således:
"Personer, der ikke er tilmeldt folkeregisteret, skal, inden der kan udbetales dem A-indkomst, tilmeldes til folkeregisteret. I særtilfælde kan Færøernes Ligningsrådet dog give personer i henhold til pkt. 1 et foreløbigt nummerbevis, som den anvisningspligtige skal benytte ved lønanvisning til vedkommende."

7) I § 63, stk. 1 tilføjes:
"Den anvisningspligtige skal i forbindelse med hver lønanvisning af A-indtægt, give lønmodtager skriftlig besked, med oplysning om anvisningspligtiges navn, adresse og arbejdsgiverlad, og lønmodtagers navn og personnummer, den periode hvor indkomsten er erhvervet, A-indtægt, modkrav og ikke skattepligtige ydelser."

8) § 64, pkt. 2 udgår.

9) § 75, stk. 1 affattes således:
"Antager ligningsmyndighederne at den allerede betalte foreløbige skat væsentlig vil overstige slutskatten, og det vil virke åbenbart urimeligt at afvente det i § 79 fastsatte tids-

jalding, verður ein upphædd, sum svarar til tann eftir meti líkningarvaldsins ov nógv goldna skattin, afturgoldin skattgjaldaranum eftir umbøn."

10) § 76 verður orðað soleiðis:

"Skattskyldugur kann gjalda meira í fyribils skatti enn tað, sum kravt er inn við skattarokning ella er eftirhildið. Tílík inngjalding kann eisini verða gjørd aftan á, at inntøkuárið er lokið, tó í seinasta lagi 31. mars í tí ári, sum líknað verður í."

11) § 77, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Í tí endaligu skattinum, sum álíknaður verður tí skattskylduga í einum ári, verða niðanfyrinevndu gjøld viðvíkjandi sama ári mótroknað"

12) § 77, stk. 1, litra b verður orðað soleiðis:

"A-skattur, sum hin skattskyldugi er skyldugur at gjalda sambært § 130."

13) Í § 77 verður sum stk. 3 sett:

"Avlopsskattur, ið ein hjúnafelagi fær eftir § 79, kann við játtan frá hesum mótroknast í frestandi skatti, sum verður álagdur hinum hjúnafelaganum eftir § 78."

14) § 78, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"Skattskyldugur skal gjalda ta upphædd, sum endaligur skattur er hægri enn fyribilsskatturin, sum verður mótroknaður eftir § 77. Hesin verður nevndur "frestandi skattur". Er frestandi skatturin við eykagjaldi

punkt for tilbagebtaling, tilbagebetales på begæring det beløb til skatteyder, som efter ligningsmyndighedernes skøn er betalt for meget."

10) § 76 affattes således:

"Den skattepligtige kan indbetale foreløbig skat ud over, hvad der er indeholdt i A-indkomst eller opkrævet ved skatteregning. Sådan indbetaling kan også foretages efter udløbet af indkomståret, men ikke senere end den 31. marts i det år, ligningen foretages."

11) § 77, stk. 1, pkt. 1 affattes således:

"I den slutskat, der for et år pålignes den skattepligtige, modregnes nedenfornævnte beløb vedrørende samme år"

12) § 77, stk. 1, litra b affattes således:

"A-skat som den skattepligtige er pligtig til at betale i henhold til § 130."

13) I § 77 indsættes som stk. 3:

"Overskydende skat, der tilkommer en ægtefælle i henhold til § 79, kan med tilladelse fra denne, modregnes i restskat, der pålægges den anden ægtefælle i henhold til § 78."

14) § 78, stk. 1 affattes således:

"Den skattepligtige skal tilsvare det beløb, hvormed slutskatten måtte overstige de foreløbige skatter, der modregnes efter § 77. Beløbet nævnes "restskat". Er restskatten med tillæg efter stk. 2, 100 kr. eller min-

eftir stk. 2 100 kr. ella minni, verður hesin ikki innkravdur."

15) § 78, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Við gjalding av frestandi skatti skal gjaldast landskassanum eitt eykagjald uppá 6% av frestandi skattinum."

16) § 78, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Tann frestandi skatturin við eykagjaldi eftir stk. 2 fellur til gjaldingar í trimum javnstórum gjøldum tann 1. mai, 1. juni og 1. juli í álíkningarárinum við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum. Hvørt gjald verður bert kravt inn í heilum krónum.

17) § 78, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Er tann frestandi skatturin við eykagjaldi eftir stk. 2 kr. 1.000 ella minni, fellur tann frestandi skatturin við eykagjaldi til gjaldingar í einum gjaldi tann 1. juni í álíkningarárinum við gjaldfreist til 20. í mánaðinum."

18) § 78, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"Er endaliga uppgerðin skrivað út 1. mai í álíkningarárinum ella seinni, og er frestandi skatturin við eykagjaldi eftir stk. 2 størri enn 1.000 kr. fellur hesin til gjaldingar í trimum javnstórum gjøldum tann 1. í hvørjum av teimum trimum komandi mánaðunum við gjaldsfreist til tann 20. í mánaðinum. Er upphæddin 1.000 kr. ella minni fellur upphæddin til gjaldingar í einum gjaldi tann 1. í øðrum mánaði eftir endaligu uppgerðina við gjaldsfreist til tann 20. í mánaðinum."

dre, opkræves denne ikke."

15) § 78, stk. 2 affattes således:
"Ved betaling af restskat skal der betales landskassen et tillæg på 6% af restskatten."

16) § 78, stk. 3 affattes således:
"Restskatten med tillæg efter stk. 2 forfalder til betaling i tre ens rater, den 1. maj, 1. juni og 1. juli i slutligningsåret med betalingsfrist til den 20. i måneden. Af hver rate opkræves kun det hele kronebeløb."

17) § 78, stk. 4 affattes således:
"Er restskatten med tillæg efter stk. 2 kr. 1.000 eller mindre, forfalder restskatten med tillæg til betaling i en rate den 1. juni i slutligningsåret med betalingsfrist til den 20. i måneden."

18) § 78, stk. 5 affattes således:
"Er slutopgørelsen først udskrevet 1. maj i slutligningsåret eller senere, forfalder restskatten med tillæg efter stk. 2 i tre ens rater til betaling den 1. i hver af de nærmest følgende tre måneder, forudsat at restskatten med tillæg efter stk. 2 er større end 1.000 kr. Er det samlede beløb 1.000 kr. eller mindre, forfalder beløbet til betaling i en rate den 1. i anden måned efter slutopgørelsen med betalingsfrist til den 20. i måneden."

19) § 78, stk. 6, pkt. 1 verður strikað.

20) § 79, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Er endaligi skatturin minni enn fyribilsskatturin, sum verður mótroknaður eftir § 77, verður tað, ið eftir er, nevnt "avlopsskattur"."

21) § 79, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"Tá ið avlopsskattur verður aftur-goldin skattskylduga, verður goldið honum endurgjald svarandi til 6% av avlopsskattinum. Av avlopsskatti, ið stavar frá peningi inngoldnum eftir § 76, verður einki endurgjald latið."

22) § 79, stk. 4 verður orðað soleiðis:

"Afturgjalding av avlopsskatti við endurgjaldi eftir stk. 3 fer fram áðrenn 1. august í álíkningarárinum. Um afturgjaldingin er aftaná 1. august, verður renta roknað skattgjaldaranum fyri hvønn byrjaðan mánað frá 1. august við 1%. Áðrenn afturgjalding fer fram, verður møgulig eftirstøða av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum mótroknað."

23) § 80, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Um ein broyting verður gjørd aftaná 1. mai í álíkningarárinum í einari endaligari álíkning, og hetta hevur við sær, at frestandi skattur skal gjaldast, ella at frestandi skattur verður hækkaður, enn reglurnar í § 78 stk. 5 viðvíkjandi gjalding av uppheddini við eykagjaldi eftir stk. 2 galdandi."

24) § 80, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"Um broytt endalig álíkning, sum er gjørd aftan á 1. mai í álíkningar-

19) § 78, stk. 6, pkt. 1 udgår.

20) § 79, stk. 1 affattes således:

"Hvis slutskatten er mindre end de foreløbige skatter, der modregnes efter § 77, benævnes det overskydende beløb "overskydende skat"."

21) § 79, stk. 3 affattes således:

"Ved tilbagebetaling af overskydende skat, ydes der den skattepligt-ige en godtgørelse på 6% af den overskydende skat. Af overskydende skat, der modsvares af beløb, der er indbetalt i benhold til § 76 ydes ingen godtgørelse."

22) § 79, stk. 4 affattes således:

"Tilbagebetaling af overskydende skat med godtgørelse efter stk. 3 sker inden 1. august i ligningsåret. Hvis tilbagebetalingen sker efter 1. august, tilkommer der den skattepligtige en rente på 1% pr. påbegyndt måned fra 1. august at regne. Forinden tilbagebetalingen modregnes eventuelle restancer af personlig skat med påløbne morarenter."

23) § 80, stk. 1 affattes således:

"Medfører en ændret slutopgørelse, som foretages efter 1. maj i slutligningsåret, at der skal betales restskat eller yderligere restskat, er reglerne i § 78, stk. 5 vedrørende betaling af beløbet med tillæg efter stk. 2 gældende."

24) § 80, stk. 2 affattes således:

"Medfører en ændret slutopgørelse, som foretages efter 1. maj i slut-

árinum, ávirkar, at avlopsskattur, sum er afturgoldin skattskylduga eftir § 79, verður lækkaður ella fellur burtur, skal viðkomandi gjalda peningin aftur saman við endurgjaldi eftir § 79, stk. 3 og møguligar rentur eftir 79, stk. 4 samsvarandi reglunum í § 78, stk. 5."

ligningsåret, at der sker nedsættelse eller bortfald af overskydende skat, der er udbetalt til den skattepligtige i henhold til § 79 skal vedkommende tilbagebetale beløbet sammen med godtgørelse efter § 79, stk. 3 og eventuelle renter efter § 79, stk. 4 i overensstemmelse med reglerne i § 78, stk. 5."

25) § 80, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"Um ein broytt endalig álíkning, sum er gjørd aftan á 1. mai í álíkningarárinum, ger, at frestandi skattur verður lækkaður ella fellur burtur, verður upphæddin, sum frestandi skatturin er lækkaður við og eykagjald eftir § 78, stk. 2 útgoldin skattskylduga innan mánaðurin er úti, sum kemur aftan á útskrivingardagin. Av higartil uppkravda peningunum eigur skattskyldugi 1% rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegi. Áðrenn útgjalding, verða møguligt gjøld av frestandi skatti, sum ikki eru fallin til gjaldingar eftir § 78 og møguligar eftirstøður av persónligum skatti við tilskrivaðum rentum mótroknað."

25) § 80, stk. 3 affattes således:

"Medfører en ændret slutopgørelse, som foretages efter 1. maj i slutligningsåret, at den tidligere beregnede restskat nedsættes eller bortfalder, udbetales det beløb, som restskatten er nedsat med, samt tillæg efter § 78, stk. 2 til den skattepligtige inden udgangen af den måned, der følger nærmest efter udskrivningsdatoen. Der tilkommer den skattepligtige en rente på 1% pr. påbegyndt måned fra forfaldsdagen for de tidligere opkrævede beløb. Forinden udbetaling modregnes eventuelle uforfaldne rater af restskat efter § 78 og eventuelle restancer af personlig skat med påløbne morarenter."

26) § 80, stk. 4 verður orðað soleiðis:

"Um ein broytt endalig álíkning, sum er gjørd aftan á 1. mai í líkningarárinum, gevur tað úrslit, at avlopsskattur skal gjaldast tí skattskylduga, ella at meira avlopsskattur enn frammanundan roknað skal afturgjaldast, verður upphæddin afturgoldin við endurgjaldi eftir § 79, stk. 3 og møguligum rentum eftir § 79, stk. 4 innan mánaðurin, sum

26) § 80, stk. 4 affattes således:

"Medfører en ændret slutopgørelse, som foretages efter 1. maj i slutligningsåret, at der fremkommer overskydende skat eller yderligere overskydende skat end tidligere beregnet, tilbagebetales beløbet med godtgørelse efter § 79, stk. 3 og eventuelle renter efter § 79, stk. 4 inden udgangen af den måned, der følger nærmest efter udskriv-

kemur aftan á útskrivingardagin, er úti. Áðrenn afturgjalding verða møguligar eftirstøður av persónligum skatti og tilskrivaðar rentur mótroknaðar."

27) § 120, stk. 2, pkt. 2 verður orðað soleiðis:

"Har, ið keypari ella seljari er umboðaður av sakførara ella øðrum fulltrúa, hevur hann skyldu at siga frá navni, føðingardegi, raðtali ella arbeiðsgevaratali og bústaði hjá klienti sínum."

28) § 120 b, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Bankar, sparikassar, postgirostovan og onnur, sum taka ímóti innláni til renting, skulu í sambandi við fyribilsskattaskráseting og skattaálíkningina á hvørjum ári uttan at biðið verður um tað, lata líkningarmyndugleikunum upplýsingar um upphædd av latnum ella góðskrivaðum rentum til teir einstøku kontohavararnar fárinum frammanundan og upphædd av tí innistandandi við árslok í árinum frammanundan. Landsstýrið kann áseta, at samsvarandi upplýsingar skulu latast av øðrum, sum renta, ognir, sum annar persónur eigur."

29) Í § 120 b, stk. 2 verður ístaðin fyri "persóntal", sett:"raðtal".

30) § 120 c verður orðað soleiðis:

"Ein konto sambært § 120 b, stk. 1 skal verða tengd at einum raðtali ella arbeiðsgevaratali.

Stk. 2. Tann, ið er upplýsingarskyldugur eftir § 120 b, útvegar kontohavara-

bingsdato. Forinden tilbagebetaling modregnes eventuelle restancer af personlig skat og påløbne morarenter."

27) § 120, stk. 2, pkt. 2 affattes således:

"Hvor køber eller sælger repræsenteres af en advokat eller en anden befuldmægtiget, er denne pligtig at give oplysning om klientens navn, fødselsdato, løbenummer eller arbejdsgivernummer og adresse."

28) § 120 b, stk. 1 affattes således:

"Banker, sparekasser, postgirokontoret og andre, der modtager indskud til forrentning, skal til brug ved forskudsregistrering og skatteligningen hvert år uden opfordring give ligningsmyndighederne oplysning om størrelsen af ydede eller godskrevne renter til de enkelte kontohavere i det foregående år, samt størrelsen af det indestående beløb ved udløbet af det foregående år. Landsstyret kan bestemme, at tilsvarende oplysninger skal afgives af andre, der forrenter midler tilhørende en anden person."

29) I § 120 b, stk. 2 erstattes "personnummer" af "løbenummer".

30) § 120 c affattes således:

"En konto i henhold til § 120 b, stk. 1, skal være tilknyttet et løbenummer eller arbejdsgivernummer.

Stk. 2. Den, der er oplysningspligtig i henhold til § 120 b anskaffer konto-

num raðtal ella arbeiðsgevaratal frá Líkningarráð Føroya.

Stk. 3. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um, hvørjar upplýsingar kontohavari skal láta upplýsingarskyldugum í sambandi við stovnan av konto, og sum eru neyðugir, fyri at vita, hvør kontohavarin er.

Stk. 4. Landsstýrið kann eftir nærri reglum, ásettum við kunngerð, leggja hald á innistandandi á konti, sum ikki kunnu ávísast til veruligu eigararnar."

31) § 120 h, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Bankar, sparikassar, Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnurin, Jarðargrunnurin, Memingargrunnur Ídnaðarins, P/F Húsalán, tryggingarstovur og onnur, sum sjálvi ella vegna onnur læna pening út ímóti renting, skulu í sambandi við fyribilsskattaskráseting og skattaálíkningina á hvørjum ári láta teir í stk. 2 nevndu upplýsingar til líkningarmyndugleikarnar."

32) § 120 k verður orðað soleiðis:

"Eitt lán sambært § 120 h skal vera tengt at einum raðtali ella arbeiðsgevaratali. Ein goymsla sambært § 120 j skal vera tengd at einum raðtali ella arbeiðsgevaratali.

Stk. 2. Tann, ið er upplýsingarskyldugur sambært § 120 h og 120 j, útvegar lántakara ella goymsluhavara raðtal ella arbeiðsgevaratal frá Líkningarráð Føroya.

haveren et løbenummer eller arbejdsgivertal fra Færøernes Ligningsråd.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for hvilke oplysninger kontohaver skal give til oplysningspligtige som identifikation af kontohaver i forbindelse med oprettelse af en konto.

Stk. 4. Landsstyret kan efter nærmere regler fastsat med bekendtgørelse indrage indestående på konti, der ikke kan henføres til de virkelige ejere.

31) I § 120 h, stk. 1, affattes 1. pkt. således:

"Banker, sparekasser, Føroya Ídnaðargrunnur, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnurin, Jarðargrunnurin, Memingargrunnur Ídnaðarins, P/F Húsalán, forsikringsselskaber og andre, der som led i deres virksomhed yder eller formidler udlån mod forrentning skal til brug ved forskudsregistrering og skatteligningen hvert år indberette de i stk. 2 nævnte oplysninger til ligningsmyndighederne."

32) § 120 k affattes således:

"Et lån i henhold til § 120 h skal være tilknyttet et løbenummer eller et arbedsgivernummer. Et depot i henhold til § 120 j skal være tilknyttet et løbenummer eller et arbejdsgivernummer.

Stk. 2. Den, der er oplysningspligtig i henhold til § 120 h og § 120 j anskaffer låntager og eller depothaver et løbenummer eller arbejdsgivertal fra Færøernes Ligningsråd.

Stk. 3. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um, hvørjar upplýsingar lántakarar og goymsluhavarar skulu lata upplýsingarskylduga í sambandi við stovnan av láni ella goymslu, og sum eru neyðugir, fyri at vita, hvør lántakarin ella goymsluhavarin er."

33) Í § 120 m, stk. 1, 1. pkt. verður í staðin fyri "persóntal", sett: "raðtal".

34) Í § 126 verður sum stk. 2 sett:

"Landsstýrið kann við nærri reglum lata Líkningarráðnum tí í stk. 1 nevndu heimild tit at áleggja dagliga sekt."

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó koma fylgjandi broytingar í gildi soleiðis:

3) fær gildi fyri beiðursgávur útgoldnar frá og við inntøkuárinum 1991, 5) og 7)-9) koma í gildi 1. januar 1993, 11) og 14). pkt. 1 koma í gildi 1. januar 1994, 19) kemur í gildi 1. februar 1993, 20) kemur í gildi 1. januar 1994.

Stk. 2. Landsstýrið ásetir við kunngerð nær broytingarnar 27)-33) koma í gildi.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelse om, hvilke oplysninger en låntager eller depothaver skal give oplysningspligtige til identifikation af vedkommende i forbindelse med oprettelse af et lån eller et depot."

33) I § 120 m, stk. 1, 1. pkt. erstattes "personnummer" af "løbenummer".

34) I § 126 indsættes som stk. 2:

"Landsstyret kan med nærmere regler henlægge til Ligningsrådet den i stk. 1. nævnte beføjelse at pålægge daglige bøder."

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse, dog træder følgende ændringer i kraft således:

3) træder i kraft for hædersgaver udbetalt fra og med indtægtsåret 1991, 5) og 7)-9) træder i kraft 1. januar 1993, 11) og 14) pkt. 1 træder i kraft 1. januar 1994, 19) træder i kraft 1. februar 1993, 20) træder i kraft 1. januar 1994

Stk. 2. Landsstyret fastsætter med bekendtgørelse hvornår ændringerne 27)-33) træder i kraft.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broytingar í skattalógini eru fyrst og fremst broytingar viðvíkjandi reglunum fyri frestandi skatt og avlopsskatt, og broytingar av reglunum um upplýsingarskyldu, ið tengd er at P-talinum.

Tær uppskotnu broytingarnar føra við sær, at ávikavíst avlopsskattur og frestandi skattur vegna eina framskundaða líkning kunnu verða avgreidd fyrr í líkningarárinum, so at skattgjaldarin longu í mai mánaði kann fáa afturgoldnan tann skatt, viðkomandi hevur goldið ov nógv árið frammanundan, meðan tann skatt-

gjaldari, ið fær frestandi skatt, eisini vil verða kravdur eftir hesi upphæddi fyrr enn eftir verandi skipan.

Eftir uppskotinum verður sjálv innkrevjingin av tí frestandi skattinum broytt, so at allur frestandi skattur framyvir verður innkravdur við rokning, so at skilja, at frestandi skattur fyri eftirfylgjandi ár ikki longur verður at býta sundur sum inn roknaður skattur fyri eftirfylgjandi ár, um upphæddin er undir ávísa upphædd, og kravdur inn við rokning, um upphæddin er større enn ein ásett upphædd, men hvørfturímóti verður allur frestandi skattur kravdur inn við rokning uttan mun til, hvør upphæddin er.

Mett verður, at hetta fyri skattgjaldarin vil gera, at hann fer at hava lættari við at fylgja við sjálvari uppgerðini av sínum skatti. Viðkomandi fer sostatt sjálvur at hava betri yvirlit yvir, nær og hvussu tann frestandi skatturin verður kravdur og fellur til gjaldingar. Hetta tí sum er, verður eitt nú frestandi skattur fyri 1989, ið varð undir 5.000,- kr. innkravdur saman við fyribilsskattinum fyri 1991, meðan frestandi skattur yvir 5,000,- kr. varð kravdur inn við rokning í 1990. Hetta førir millum annað við sær, at fyri løntakarar, sum av eini ella aðrari orsøk, ikki høvdu skattskylduga inntøku í Føroyum í 1991, hevur tað ikki verið møguligt at krevja inn tann frestandi skattin undir 5.000,- kr., men er hesin skattur nú um ársskiftið vorðin útlagdur til rokningar. Hetta hevur mangan ført til stóra misnøgd frá skattgjaldarans síðu. Tað verður eisini mett at vera óheppið, at fólk á henda hátt ikki fara at fáa veruligar rokningar fyri frestandi skatt, fyrr enn meir enn 2 ár aftaná at inntøkuárið er farið. Skotið verður tí upp, at allur frestandi skattur framyvir skal fara út sum rokning longu í líkningarárinum.

Av hesi umlegging frá innroknaðu framskundaðu viðgerðini av avlopsskatti og frestandi skatti.

Skotið verður upp, at tær heiðursgávur føroyingar fáa eftir lógini um "erstatning til besættelsestidens ofre" fra 1945 verða gjørdar skattafríar eins og eftir donsku skattareglunum.

Eisini verður skotið upp, at innsavningar, ið fara fram til hjálp til persónar, ið hava mist forsyrgjara av vanlukkuávum ella líknandi, gerast skattafríar hjá móttakaranum.

Í uppskotinum eru reglur gjørdar um at treytað burturfalling av fullari skattskyldu hjá persónum eftir § 1 nr. 2 til at verða tengdar at, hvørja skattaskipan viðkomandi er komin undir í útlandinum. Harvið verður neyðugt at skilja millum góðkend skattalond og ikki góðkend skattalond, alt eftir hvørjar skattaskipanir kunnu metast sum góðkendar her hjá okkum.

Síðan verður sett uppskot fram um at fáa broytt reglurnar í skattalógini um nýtsluna av P-talinum, sum jú, sum kunnugt ongantíð eru komnar at virka eftir ætlan.

Tað verður framvegis mett, at tað er av alstórum týðningi, at skattamyndugleikarnir kunnu fáa upplýsingar um viðurskifti, sum eru viðkomandi fyri skattingina á ein so hentan, men forsvarligan hátt sum gjørligt. Í hesum neyðuga samskifti við eitt nú peningastovnar er neyðugt at kunna hava eitt tekniskt lætt samskifti.

Fyri at tryggja eina munadyggari skattaálíkning og neyvari skattaeftirlit verður skotið upp í høvuðsheitti at varðveita verandi reglur um P-tal, men við tí týðandi broyting at P-tal verður skift út við eitt raðtal.

Raðtalsskipanin er ætlað at virka á tann hátt, at allir persónar í Føroyum við P-tali og øll við arbeiðsgevaratali, verða skrásett av Líkningarvaldinum við einum raðtali til nýtslu í samskiftinum við eitt nú peningastovnar. Ein tílík skipan ber í sær eina sjálvvirkandi flyting av upplýsingum úr peningastovnum o.ø. til líkningarvaldið. Sjálvvirkandi skipanin merkir eina skjótari álíkning av løntakarum, og hevur tann fyrimun fyri A-skattgjaldarar, at teir verða rættari skrásettir við eitt nú rentútreiðslum gjøgnum alt árið, og harvið skuldi møguleikin fyri avlopsskatti ella frestandi skatti eisini minkað munandi.

Tá raðtal nú verður skotið upp ístaðin fyri tað verandi P-talið verður eisini havt í huga, tann ótti fólk hava víst seg at hava havt fyri møguleikanum um samkoyring av upplýsingum millum peningastovn og skattavald vegna somu skráseting. Tá nú samskifti millum peningastovnar og líknignarmynduleikar skal fara fram við raðtali, meðan sjálv skattaskipanin skrásetir við P-tali, skuldi vandin fyri samkoyring verið burtur.

Nú tá so mangar veitingar og krevjingar, umframt skatt, eru vorðnar tengdar at skattaskipanini sum so, so er mangan torført hjá skattgjaldara at halda greiði á, hvat veruliga verður trekt av hvørjari einstakari lønarflyting til skatt. Mett verður, at neyðugt er at bøta um hesi viðurskifti á tann hátt, at skattgjaldari í samband við hvørja lønarflyting kann fáa neyvari útgreinan av samlaða afturhaldinum í løninni, so at tað sæst av hvørjari lønarflyting, hvat er A-inntøka, hvat er afturhildið av arbeiðsgevara, goldið á frítíðarlønarkonto, og hvat er skattur o.s.fr.

Tað verður í hesum sambandi álagt ávísingarskyldugum at lata løntakara neyvari lønarseðlar enn higartil hevur verið vanligt. Somuleiðis verður álagt avrokningarstøðum at lata neyvari upplýsingar, samstundis sum avroknað verður.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

Til § 1, nr. 2:

Tað hevur leingi víst seg at verða neyðugt við eini nærri áseting av treytum fyri at sleppa undan fullari skattskyldu til Føroya í samband við fráflyting. Londini rundan um okkum hava í fráflytingarstøðum ikki góðkent skattligu fráflytingina, fyrr enn skattgjaldarin hevur prógvað, at viðkomandi er komin undir skattskyldu

í øðrum landi, har skattskyldan líkist okkara skattskyldu so mikið nógv, at tað veruliga kann sigast at fara ein inntøkuskatting fram, sum er á umleið jøvnum føti við okkara skipan.

Treytin fyri at tilflytaralandið skal verða eitt góðkent skattaland, t.v.s. hava eina góðkenda skanaskipan, hevur ikki verið orðað í okkara reglum, men verður her skotið upp, at vit samsvarandi donsku skattareglunum á hesum øki krevja, at tilflytaralandið er eitt góðkent skattaland, fyri at skattskyldan í Føroyum hjá viðkomandi kann halda uppat innan 4 ár frá fráflyting.

Okkara meting av, hvørjar skattaskipanir kunnu metast sum góðkendar, stiðja seg at teim donsku reglunum á hesum øki. Hóskandi hevði tí verið, at Føroya Landsstýri í hesum sambandi ger kunngerð um, hvørji lond longu nú kunnu metast at lúka tær uppskotnu treytirnar í § 1 nr. 2.

Metingin fer annars at verða ein heildarmetan av skattaskipanini, og um skattingin fer fram samsvarandi okkara høvuðsreglu um globalinntøkuskatting t.v.s. skatting av inntøku eftir nærri reglum, uttan mun til hvaðani inntøkan stavar.

Til § 14, stk. 3:

Her verður gjørd tann broyting viðvíkjandi búðsuppgerðum, at tað verður ein føst skylda hjá búnum at lata skattavaldinum eina uppgerð yvir ogn og skuld við andlát saman við inntøkuuppgerð yvir inntøku hins deyða frá inntøkuársins byrjan til andlátið, ístaðin fyri sum nú, har búgvið bert hevur skyldu at lata hesar upplýsingar eftir umbøn frá skattavaldinum.

Til § 29, nr. 10:

Her verða tær heiðursgávur, ið føroyingar fáa sambært lóg nr. 475 frá 1. oktober 1945 um "erstatning til besættelsestidens ofre" gjørdar skattafríar. Broytingin verður fyrstu ferð galdandi fyri heiðursgávur útgoldnar í inntøkuárinum 1991.

Til § 29, nr. 17:

Tær peningagávur, ið fólk mangan savna saman og veita til persónar, sum av vanlukkuávum missa forsyrgjara, eru, sum er, skattskyldugar veitingar. Her verður skotið upp, at gera veitingarnar skattafríar fyri móttakaran. Skattafrítøkan er treytað av, at veitingin er savnað inn millum eina breiðari fjøld av fólki, og at gávan bert er ein gáva, veitt sum hjálp til persón, sum hevur mist uppihaldara í samband við vanlukkutilburð, ella líknandi hendingar. Við uppihaldara er at skilja uppihaldaraevni. Álvarslig og long sjúkralega kann eisini koma undir hesa reglu, og eru slíkar umstøður tí eisini at líkna við vanlukkutilburðir eftir hesi grein.

Til broytingarnar í §§ 63 og 64:

Hesar broytingar bera í sær, at arbeiðsgevarar/ávísingarskyldugir nú skulu lata løntakara neyvari upplýsing á lønarseðli um, hvat er eftirbildið í A-inntøkuni við

ymiskum mótkrøvum, samstundis sum skattgjaldarin annars skal hava nærri upplýsingar frá avrokningarstaðnum í samband við avrokningina av hvørjari A-inntøku og A-skatti. Her verður eina mest hugsað um, at tað skal verða gjørligt hjá skattgjaldara at siggja, hvat A-inntøkan er, hvat er eftirhildið av arbeiðsgevara, forvunna upphæddd, hvat verður trekt til fríttíðarlønarkonto o.s.fr. Harvið skuldi verið betri møguleiki hjá tí einstaka at fylgt við í, hvat viðkomandi veruliga rindar í skatti av A-inntøkuni og hvørjar aðrar upphæddir eru eftirhildnar í løn hansara.

Ásett er, at Landsstýrið kann gera nærri reglur viðvíkjandi sundurgreiningina, so at øll avrokningarstøð koma at geva líknandi upplýsingar og á sama hátt. Broytingin fær gildi 1. januar 1993.

Til § 63, stk. 4:
Verandi skipan við útflýggjan av nummarprógvi til persónar, sum ikki búgva í Føroyum, og tí ikki eru skrásettir hjá fólkayvirlitinum í Føroyum, hevur havt nógvar trupulleikar við sær, við tað, at tað ikki hevur verið gjørligt at tryggja, at nummarprógvið bert varð nýtt sum ein fyribilsloysn, so leingi viðkomandi ikki búði í Føroyum. Mælt verður til at broyta ásetingina soleiðis, at sum meginreglu skulu persónar, ið fáa A-inntøku frá/úr Føroyum verða skrásettir hjá fólkayvirlitinum, so líkningarvaldið og arbeiðsgevarar kunnu nýta teirra skráseting har í samband við lønarávísing og skattaavrokning. Líkningarráðið kann tó í serligum førum lata persónar fáa eitt fyribils nummarprógv at nýta í samband við lønarflyting. Her verður eina mest hugsað um persónar, sum ikki eru í Føroyum, men hóast hetta fáa inntøku úr Føroyum, og so eisini persónar, ið bert steðga í Føroyum í stutt tíðarskeið.

Til broytingarnar í §§ 75-80:
Hetta eru alt broytingar til at framskunda líkningina, so avlopskattur og frestandi skattur kann verða fyrr viðgjørdur.

Í § 76 verður tíðarfreistin fyri inngjalding av sjálvboðnum gjøldum framskundað til 31. mars.

Í § 78 verður núverandi eykagjald uppá 9% í samband við frestandi skatt ásett til 6%. Frestandi skattur við eykagjaldi verður ásettur at falla til gjaldingar í trimum javnstórum gjøldum, um upphæddin er yvir 1.000 kr. og í einum gjaldi um upphæddin er 1.000 kr. ella minni. Forfallsmánaðirnir fyri álíkningar gjørdar aðrenn 1. mai verða settir til 1. mai, 1. juni og 1. juli við vanligari gjaldsfreist til 20. í mánaðinum. Í stk. 5 verður sama regla um gjalding av frestandi skatti, ið stavar frá álíkning, ið er gjørd eftir 1. mai ásett soleiðis, at eisini hesin frestandi skatturin fellur til gjaldingar í trimum javnstórum gjøldum, um upphæddin er yvir 1.000 kr. og í einum gjaldi, um upphæddin er 1.000 kr. ella minni. Forfallsdagur verður fluttur samsvarandi álíkningini.

Í § 79 verður endurgjaldið, ið verður latið sum ískoyti til avlopskatt, niðursett frá 9% til 6%. Samstundis verður ásett, at av avlopskatti, ið kann sigast at stava frá peningi, ið er inngoldin sum sjálvboðið inngjald eftir § 76, verður einki endurgjald latið. Um afturgjaldingin av avlopsskatti er seinni enn 1. august í álíkningarárinum, verður latið eitt eyka ískoyti uppá 1% fyri hvønn byrjaðan mánað frá 1. august at rokna.

§ 80 verður her dagført, so dagfestingarnar samsvara við ta framskundaðu álíkningina, og samstundis verður ásett, at frestandi skattur stavandi frá broyttari álíkning fellur til gjaldingar á líknandi hátt sum frestandi skattur annars.

Somuleiðis verður møguligur avlopsskattur stavandi frá broyttari álíkning eisini afturgoldin skattgjaldara samsvarandi reglunum um afturgjalding av avlopskatti annars.

Til broytingarnar í §§ 120-120 m:

Her verður skipanin við flyting av upplýsingum millum eitt nú peningastovnar og skattavaldið við P-talinum býtt út við eitt raðtal. Upplýsingarskyldugi skal eftir uppskotinum útvega sær raðtal ella arbeiðsgevaratal frá Líkningarráð Føroya fyri tann einstaka kontohavaran, lántakaran og goymsluhavaran, og verður hetta raðtal so at nýta, tá upplýsingarstaðið seinni skal lata líknignarvaldinum upplýsingar til nýtslu fyri fyribilsskrásetingina, skattalíkningina og skattaeftirlitið.

Landsstýrið ásetir við kunngerð, nær broytingarnar við raðtalsnýtsluni fáa gildi og ger annars nærri reglur fyri freist og mannagongd í samband við innlating av upplýsingunum frá tí uppslýsingarskylduga.

Í § 126 verður Landsstýrinum heimilað við nærri kunngerð at lata Líkningarráðnum heimildina til at áleggja dagligar sektir eftir kap. 12.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 101/1991: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 26. februar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 17. mars 1992 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við landsstýrismannin í skattamálum og við umboð fyri Líkningarráð Føroya. Somuleiðis hevur nevndin hildið fund við umboð fyri bankar og sparikassar. Eftir ynski hevur nevndin eisini hildið fund við persónar, sum fáa krígspensión. Hesin fundur snúði seg um uppskotnu reglurnar um skatting av krígspensiónini og sømdargávuni.

Nevndin hevur eisini fingið nøkur skriv. Í skrivi til nevndina hevur landsstýrið biðið nevndina um at gera eina broyting í § 63, stk. 1. Hetta er ein neyðug lógarteknisk broyting í sambandi við umsiting m.a. av nýggju arbeiðsloysistryggingarskipanini. Nakrir peningastovnar hava skrivað til nevndina og mótmælt, at viðkaða upplýsingarskyldan verður áløgd peningastovnunum. Nøkur felløg hava skrivað og mótmælt raðtalsskipanini.

Nevndin hevur gjøgnumgingið og viðgjørt allar broytingarnar. Men undir viðgerðini í nevndini hava serliga tveir spurningar verið nógv umrøddir. Hesir eru spurningarnir um eina raðtalsskipan og um upplýsingarskylduna mótvegis skattgjaldarunum. Hesir báðir spurningarnir fingu eisini størstu umrøðuna á fundinum við landstýrismannin og líkningarráðið og á fundinum við peningastovnarnar.

Landsstýrismaðurin og líkningarráðið søgdu, at raðtalsskipanin vil fremja eina effektivari og neyvari álíkning, og at skipanin eisini vil føra til eina munandi sparing í skattaumsitingini. Tann viðkaða upplýsingarskyldan førir við sær, at skattgjaldararnir fáa fleiri upplýsingar, við tí úrsliti at talið av fyrispurningum til skattavaldið minkar munandi. Hetta merkir eisini eina sparing í skattaumsitingini.

Umboðini fyri bankar og sparikassar tóku ikki undir við raðtalsskipanini. Umboðini søgdu seg einki hava fmóti, at upplýsingarksyldan verður víðkað, men dugdu ikki at skilja, hví henda skylda skal áleggjast peningastovnunum. Umboðini fyri stovnarnar hildu, at upplýsingarskyldan eigur at áleggjast skattavaldinum og vístu á, at verður hendan áløgd peningastovnunum fer hetta at geva stovnunum nógv eykaarbeiði og harvið eisini stórar eykaútreiðslur.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tveir meirilutar og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Vilhelm Johannesen, Eyðun Viderø og Jørgen Niclasen) mælir til, at § 63, stk. 1 verður orðað soleiðis: Áðrenn A-inntøka verður goldin skattgjaldara, skal A-skattur avroknast í upphæddini og ávísingarskyldugi skal avrokna arbeiðsgevaragjald til arbeiðsloysisstryggingina. Hann, hvørs vegna A-inntøka verður útgoldin (hin ávísingarskyldugi), skal gjalda A-inntøkuna og arbeiðsgevaragjald til arbeiðsloysistryggingina inn til eitt av landsstýrinum góðkent avrokningarstað. Avrokningarstaðið avroknar A skatt, og flytur hann til landskassan og avroknar arbeiðsgevaragjald til arbeiðsloysistryggingina, meðan restupphæddin verður útgoldin tí ávísingarskylduga. Avrukning av A-inntøku samhiert § 60, stk. 1 nr. 8 áliggur tí, sum fær arbeiði gjørt. Avrokningarstaðið hevur skyldu til mótvegis skattgjaldaranum at gera eina gjølla sundurgreinan av, hvat verður eftirhildið í hvørjari A-inntøku.

Landsstýrið kann áseta nærri reglur um sundurgreiningina. Eisini mælir meirilutin til í § 76 at broyta 31. mars 1992 til 15. apríl 1992 bert viðvíkjandi 1992.

Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi :

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) § 63, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Áðrenn A-inntøka verur goldin skattgjaldara, skal A-skattur avroknast í upphæddini og ávísingarskyldugi skal avrokna arbeiðsgevaragjald til arbeiðsloysistrygging ina smb. løgtingslóg nr. 16 frá 10. mars 1992 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. Hann, hvørs vegna A-inntøka verður útgoldin (hin ávísingarskyldugi), skal gjalda A-inntøkuna og arbeiðsgevaragjald til arbeiðsloysistryggingina inn til eitt av landsstýrinum góðkent avrokningarstað. Avrokningarstaðið avroknar A-skatt og flytir hann til landskassan og avroknar arbeiðsgevarargjald til arbeiðsloysistryggingina, meðan restupphæddin verur útgoldin tí ávísingarskyldaga. Avrokning av A-inntøku sambært § 60, stk. 1 nr. 8 áliggur tí, sum fær arbeiðið gjørt. Avrokningarstaðið hevur skyldu til mótvegis skattgjaldararnum at gera eina gjølla sundurgreinan av, hvat verður eftirhildið í hvørjari A-inntøkut.

Landsstýrið kann áseta nærri reglur um sundurgreiningina.

1) § 63, stk. 1 affattes således:

"Inden A-indkomst udbetales den skattepligtige, skal der indeholdes A-skat i beløbet, og den anvisningspligtige skal afregne arbejdsgiversbidrag til arbejdsløshedsforsikringen i henhold til lagtingslov nr 16 fra 10. mars 1992 om arbebejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning. Den, for hvis regning A-indkomsten udbetales (den anvisningspligtige), skal indbetale A-indkomsten samt arbejdsgeverbidrag til arbejdsløshedsforsikringen til et af landsstyret godkent afregningssted. Afregningsstedet foretager indholdelsen af A-skat og indbetaler skatten til landskassen og afregner arbejdsgiverbidraget til arbejdsløshedsforsikringen, medens restbeløbet udbetales til den anvisningspligtige. Indeholdelsespligten ved udbetaling af A-indkomst efter § 60, stk. 1, nr. 8 påhviler den, for hvem arbejdet udføres. Afregningsstedet har overfor skatteyderen pligt til at foretage en nøje specifikation af, hvad der bliver tilbageholdt i hver enkelt A-indkomst.

Landsstyret kan fastsætte nærmere regler vedrørende specifikationen.

Sami meiriluti mælir til at gera tað broyting í gildisásetingini viðvíkjandi pkt. 10, at fyri 1992 fær reglan gildið frá 15. apríl, men annars framyvir 31. mars í tí ári sum líknað er.

Viðvíkjandi pkt. 5: § 63, stk. 1 verður í gildisreglini í § 2 at tilskila at áseingin frá byrjan til og við reglini: "sum fær arbeiði gjørt" verður gildisreglan sett til 1. juni 1992 og restin av greinini sum byrjar við: "Avrokningarstaðið" fær gildið frá 1. januar 1993.

Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 2 verður gjørdar hesar broytingar:
"Viðvíkjandi punkt 10: § 76 verður "31. mars 1992" broytt til "15. apríl 1992, annars framyvir 31. mars".

2) Í § 2 verða gjørdar hesar broytingar: Viðvíkjandi punkt 5: § 63, stk. 1 frá byrjan til og við orðingin ið endar við "sum fær arbeiði gjørt" verður sett í gildi 1. juni 1992 meðan restin av stk. 1 verður sett í gildi 1. januar 1993.

1) I § 2 foretages følgende ændring:
"Vedrørende punkt 10: § 76 ændres "31. mars 1992" til "15. april 1992, ellers fremover 31. mars",

2) I § 2 foretages følgende ændringer: Vedrørende punkt 5: § 63, stk. 1 fra begyndelsen sættes den til og med formulering, der ender med ordene: "som får arbejde gjort" sat i kraft den 1. juni 1992 medens resten af stk. 1 sættes i kraft 1. januar 1993,

Annars verður tikið undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Lasse Klein) ger vart við, at fíggjarliga støðan hjá fólki gerst alsamt truplari. Fleiri eru tey, sum mugu rýma frá húsi og heimi orsakað av tvingsilssølum, og uppaftur størri partur er hóttur so álvarsamt, at tað bert er ein spurningur, nær hús teirra fara sama veg, umframt hetta er arbeiðsloysið eisini økt munandi ta seinastu tíðina, og øll tekin eru um, at tað gerst truplari og truplari hjá fleiri familjum at fáa endarnar at røkka saman.

Ágangurin móti teimum, sum eiga egin hús, orsakað av m.a. rentuútreiðslum og skuldarrentum, minking av ognarvirðum ger, at fólk hava fingið alt fleiri trupulleikar at dragast við. Tá ið so hugsað verður um at selja egnan bústað fyri at keypa annan bústað fyri rímuliga upphædd, er søluvirðið á bústaðnum lækkað munandi niður um samlaðu lánsupphæddina.

Alt í alt er hetta stig fyri stig í ferð við at máa støðið undan í náttúrliga politikki, ið hevur havt breiða undirtøku; at tað, at spara upp til og eiga egnan bústað, er gott og mennandi bæði fyri tann einstaka og samfelagið.

Endamálið má verða, at fólk sleppa undan at merkja ótryggleika, tá talan er um egnan bústað. Løgtingið eigur at viðvirka soleiðis, at trýstið á egnan bústað ikki økist uppaftur meira, men heldur miða eftir, at førdur verður ein politikkur, sum lættir um trýstið hjá fólki og tryggjar umstøðurnar hjá fólki, ið eigur egnan bústað.

Í Danmark er nú fjórði hvør húsaeigari "insolventur", t.v.s. at skuldin er størri enn virðið á húsinum. Í Føroyum finnast eingi slík hagtøl, men øll tekin eru um, at Føroyar skjótt nærkast somu støðu.

Tað almenna ger beinanvegin vart við seg, tá privatar ella húlvalmennir stovnar og fyritøkur koma illa fyri. Eisini tá talan er um fyritøkur, sum hava stóran týdning fyri eina ávísa bygd ella oyggj. Tann einstaka familjan má kunna krevja eina líka góða og skjóta viðgerð, tá talan er um so grundleggjandi virðir, sum tað er at hava egnan bústað og tak yvir høvdið. Ein tryggleiki, sum er av avgerandi týdningi fyri familjutrivnaðin, eigur at hava líka stóran týdning fyri samfelagið, sum týðandi vinnugreinir og lokal ábugamál.

Hetta er eisini orsøkin til, at minnilutin (Lasse Klein) mælir til, at løgtingslógin um landsskatt og kommunuskatt verður brúkt til at hjálpa trongstøddum húsaeigarum til at varðveita egnan bústað, og tí verður sett fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

1) Álagt verður landsstýrinum umframt rentufrádráttin upp á 42% at skipa fyri einum bóskandi "botnfrádrátti" fyri øll sethús, sum eru bygd í tíðarskeiðnum 1987 - 1992.
2) Álagt verður landsstýrinum somuleiðis at taka upp samráðingar um at lætta um hjá fólki, sum hava sett seg í búgv í tíðarskeiðnum 1987 - 1992.

Broytingarnar, sum gjørdar vórðu í løgtingslógini um landsskatt og kommunuskatt í 1991, førdu "ávísar" óhepnar fylgjur við sær, t.d. fingu fólk, sum ikki áttu egnan bústað, ikki møguleika fyri frádrátti av rentuútreiðslum upp á 42%, heldur ikki tey, sum t.d. innrættaðu kjallaraíbúðir hjá eitt nú foreldrum sínum, hetta heldur minnilutin (Lasse Klein) vera sera óheppið og setir tí fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera broytingar í løgtingslógini um landsskatt og kommunuskatt, sum loyva ungum hjúnum ella einstaklingum, sum innrætta kjall-

araíbúðir hjá foreldrum ella øðrum, loyvi til rentufrádrátt upp á 42% av rentuútreiðslunum.

Í teimum førum, har lógarteksturin er ógreiður, verður í fleiri førum skotið upp, at heimilað líkningarmyndugleikanum til at víkja frá, tá ávís viðurskifti vísa o.s.fr.

Hetta heldur minnilutin (Lasse Klein) vera sera óheppið og ger fyrst og fremst støðuna hjá skattabrogarunum ógreiða og síðani líkningarmyndugleikunum, og tí eigur tað í hvørjum einstøkum føri at standa heilt greitt í lógartekstinum, hvørjar møguleikar, skattaborgarin hevur innan fyri galdandi lóggávu.

Í 1991 segði landsstýrið í viðmerkingunum til lógarbroytingar, sum tá vórðu gjørdar, at tey uppskotini vóru fyrsta stigið til eina grundleggjand broyting av allari skattaskipanini. Tá ið so spurt varð, hvat næsta stigið varð, var ikki møguligt at fáa nakað nøktandi svar. Heldur ikki undir hesi viðgerðini hevur verið møguligt at fingið landsstýrið at avdúka, hvørjar grundleggjandi broytingar skulu gerast. Men fer næsta stigið í broytingunum av skattalógunum at taka burtur verandi fyrimunir, soleiðis sum líkt er til, verður gleðin sera stokkut.

Annars vísir minnilutin (Lasse Klein) til viðmerkingar sínar í sambandi við skráseting artalið, sum umfatar greinirnar 27-35 aðrastaðni.

Til hinar greinirnar setir minnilutin einki uppskot fram, men tekur støðu í tingsalinum.

102. Broyting í løgtingslóg um áseting avskatti til landskassan

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður henda broyting gjørd:

1) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Í hjúnalag verður frádrátturin í

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 2 affattes således:
"I ægteskab oppebærer ægtemand-

skattinum hjá manninum. Tó kunnu sambúgvandi hjún, tá konan er sett í skatt sambært § 4, stk. 2 í samtíðarskattalógini, sjálvi avgerða, hvør teirra skal hava frádráttin. Frádráttarin skal verða hjá sama persóni í endaligu álíkningini sum í fyribilsálíkningini. Um hjúnafelagi ikki fær nýtt frádáttin til fulnar, verður restin drigin frá í skattinum hjá hinum hjúnafelagnum."

§ 2.

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

en fradraget i skatten. Dog kan samlevende ægtefæller, hvor konen er ansat til skat i henhold til § 4, stk. 2 i kildeskatteloven selv bestemme hvem af dem skal oppebære fradraget. Fradraget skal være hos samme person i slutligningen som i forskudsregistreringen. Hvis en ægtefælle ikke kan udnytte fradraget fuldt ud, bliver resten dog at fradrage i skatten hos den anden ægtefælle."

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan er uppskot um broyting í frádráttarrættinum fyri børn.

Skotið verður upp, at hjúnafelagar sjálvir kunnu avgera, hvør teirra skal hava rættin til frádrátt fyri børnini, tó soleiðis at tann av hjúnafeløgunum, sum hevur frádráttin í fyribilslíknignini, eisini skal hava frádráttin í endalíkningini.

Hetta verður mett at verða neyðugt fyri ikki at fáa ov nógvar villur í endaálíkningini, við at frádráttur fyri børnini verður settur á sjálvuppgávur hjá báðum hjúnafelagum o.s.fr., og fyri at fyrihilsskattaskrásetingin kann gerast so neyv sum gjørligt.

Meginreglan er enn tann, at barnafrádrátturin í hjúnalag er í skattinum hjá manninum. Skal frádrátturin flytast frá hesum til konuna, er neyðugt, at tey gera vart við hetta, við at konan fyribilsskrásetur seg við frádráttinum fyri børnini, samstundis sum frádrátturin verður tikin frá manninum. Broytingin er tí treytað av, at hjúnini eru samd um, hvør teirra skal hava frádráttin, og tey skulu tí bæði skriva undir ynski um broyting av frádráttinum fyri børnini.

Fær tann av hjúnunum, ið hevur frádráttin, ikki nýtt hendan til fulnar, verður restin af frádráttinum at flyta til hin hjúnafelagan.

Við tí uppskotnu broytingini verður eisini møguligt hjá skattgjaldarum undir eitt nú DIS skipanini at fáa flutt frádráttin fyri børnini yvir á konuna, um hendan er sett í skatt sambært § 4, stk. 2.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 102/1991: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 26. februar 1992 og undir 1. viðgerð 17. mars 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og ein samd nevnd mælir løgtingimum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

103. Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri fíggjarárini 1985 - 91.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Menningargrunnur Ídnaðarsins varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973. Tað framgongur av áliti ídnaðarnevndarinnar til lógaruppskotið, at ætlanin við stovnssetanini var at menna ídnað, handverk og tænastufyritøkur í Føroyum við beinleiðis fíggjarligum studningi, ella við lánveiting o.l. "har aðrir lánistovnar ongan stuðul veita". Í § 9 í kunngerðini eru tó ásettar ávísar reglur um m. a., at fløgulán ikki mega fara uppum 90% av fløguútreiðslunum.

Lógin heimilar grunninum at veita:

- uppbygginar- / útflutningskreditt og - veðhald
- rentustudning
- studning til vørumenning og gransking v.m.
- hjálp til mennan á serligum støðum
- lán og/ella studning til fíggjan av rakstur av nýstovnaðum virkjum og umskipan av verandi

Sambært viðtøkum grunnsins, eigur nevndin at býta veitingar úr grunninum best møguligt millum ymiskar vitunugreinir, og harumframt at hava í huga neyva samvinnu við landsstýrið og ymsar stovnar til tess at samskipa heildarveitingarnar best møguligt. Viðtøkurnar áseta víðari ávís hámørk fyri tær einstøku veitingarnar í mun til (fløgu) útreiðslurnar, og at øll lán uppá meira enn 1/2 mió. kr. og veðhald størri enn 1 mió. (síðani 1989 ávíkavist 2 og 3 mió. kr.), krevja góðkenning frá landsstýrinum.

Tað fíggjarliga grundarlagið fyri virki grunnsins var ætlað at vera 1) játtan á fíggjarløgtingslógini, 2) 1 0/00 av árliga umsetninginum hjá øllum iðnaðarvirkjum, handverkara- og tænastufyritøkum og 3) lánsupptøka við landskassaveðhaldi - upprunaliga kr. 2 mió um árið í 5 ár.

Tað sæst av omanfyristandandi, at endamál grunnsins frá byrjanini hevur verið sera breitt útgreinað, men viðtøkurnar áseta ongar nærri fyriskipanir viðvíkjandi innanvirkis mannagongd so sum:

- krøv til og viðgerð av umsóknum v. m. í samband við veiting av lánum, veðhald, studningi v.m.
- internt eftirlit, debitorrøkt, innkrevjing av lánum, risikometing v. m.
- roknskaparhættir / - uppseting o.s.fr.
- førleikakrøv til leiðslu

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarfrágreiðingarnar hjá Menningargrunni Íðnaðarsins fyri árini 1985 - 1991 m.a. til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur m.a. ávíst og átalað, at bókhald grunnsins eitt skifti ikki hevur verið nóg trygt og ikki nýtiligt sum stýringsamboð hjá leiðsluni at bókføringin hevur verið nóg trygg, og at skrásetingin av skyldum grunnsins ikki hevur verið nóg góð.

Í grannskoðanarfrágreiðingini fyri árið 1991 verður tó gjørt vart við, at hesi viðurskifti nú virka væl.

Løgtingsgrannskoðararnir meta tað vera óheppið, at ein stovnur, ið hevur eitt so breitt endamál, ikki hevur fingið álagt ávís krøv til innanvirkismannagongd. Hesir manglar eru óivað ein orsøk til vánaligu fíggjarviðurskifti grunnsins í dag.

Tað tykist ógreitt, hvussu mannagongdin fyrr hevur verið í samband við avskriving og avsetan til tap uppá skuldarar, og hvussu avsetingar í tiltaks- ella "trygdargrunnin" skulu skiljast.

Í roknskapinum fram til 1987 var trygdargrunnurin at rokna sum ein avseting ímóti tapum og ikki roknað uppí eginognina.

Í 1988 verður roknskaparuppsetingin broytt, soleiðis at trygdfargrunnurin verður roknaður uppí eginognina, so at avsetingar ímóti tapi hvørki ávirka rakstrarúrslit ella støddina á eginognini.

Í 1991 verður so roknskaparuppsetingin aftur broytt soleiðis, at avsetingar uppá tap nú bæði ávirka rakstur og eginogn, við tað at útlánini verða minkað svarandi til avsetingarnar. Somuleiðis verður avsett til effektivar veðhaldsskyldur.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at hesin roknskaparháttur gevur tá mest rættvísandi myndina av rakstri, aktivum, passivum og gjaldføri, og mæla landsstýrinum til at áseta nærri standardiseraðar roknskaparreglur fyri allar teir almennu útlánsgrunnarnar.

Grunnurin hevur í tíðarskeiðnum 1986 - 1991 mist umleið 225 mió. kr. sum avsetingar/tap uppá skuldarar.

Sambært ársroknskapunum hava avsetingar og tap tey 4 árini frá 1986 - 1989 verið umleið 40 mió. kr., meðan avsetingar og tap tey seinastu 2 árini hava verið umleið 185 mió. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at fleiri avskrivingar og avsetingar áttu at verið gjørdar áðrenn 1990, um so var, at sami metingar- og roknskaparháttur sum í 1991 varð nýttur.

Samanumtikið hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Sum nevnt omanfyri var ásett í § 4 í lógini, at ein av fíggingarkeldum grunnsins skuldi vera eitt gjald uppá 1 0/00 av árliga umsetninginum hjá øllum fiskiðnaðarvirkjum, handverkara- og tænastufyritøkum. Av praktiskum grundum hevur landsstýrið mett, at gjaldið ikki skuldi innkrevjast.

   Lógin og reglugerðin er tó ongantíð broytt hesum viðvíkjandi.

   Løgtingsgrannskoðararnir átala, at hetta ikki er gjørt, og mæla til, at álagt verður landsstýrinum at kanna hesi viðurskifti aftur.

2. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at mannagongdin í samband við viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v. m. ikki hevur verið nóg væl skipað.

3. Løgtingsgrannskoðararnir heita á landsstýrið um at geva eina frágreiðing um, hvussu keyp, umbygging og fígging av bygninginum - uppá falt uml. 60 mió. kr. - har grunnurin eigur 1/3, er farin fram.

4. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at punkt 8.1 og 8. 2 í kunngerðini, har ásett er at býta veitingarnar best møguligt ímillum ymsar vinnugreinir í neyvari samvinnu við landsstýrið, ikki hevur virkað nóg væl, m. a. við tað at avgerðargrundarlagið ikki hevur verið nóg gott.

5. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at virksemið hjá Menningargrunninum, og samvinnan við Føroya Íðnaðargrunn, Búskaparráðið, Menningarstovuna og landsstýrið til tess at tryggja ein skynsaman og samskipaðan stuðuls- og útlánspolitikk til frama fyri menning og umskipan av íðnaði, handverks- og tænastufyritøkum, ikki hevur verið nóg væl skipað øll árini.

6. Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at lóg/viðtøkur verða broyttar, so at nærri krøv til viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v.m. verða ásett.

7. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrinum til at áseta nærri krøv til uppsetan av roknskapinum og til roknskaparhættir fyri tílíkar stovnar/grunnar.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/2 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Íðnaðargrunni fyri fíggjarárini 1986-90.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Roknskapirnir hjá Føroya Íðnaðargrunni eru ikki áður gjøgnumgingnir av løgtingsgrannskoðarunum, við tí grundgeving, at grunnurin ikki hevur fingið árligar játtanir á fíggjarlógini.

Eftirsum talan er um ein eksternan landskassagrunn við stórum útlánsvirksemi, og sum frá landskassanum hevur fingið stovnsfar, lán og veðhald, hava løgtingsgrannskoðararnir mett, at rættast var at gjøgnumganga roknskapirnar hjá grunninum tey seinastu 5 árini og leggja hesar fyri tingið.

Føroya Íðnaðargrunnur varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 24. september 1970.

Viðtøkurnar fyri grunnin vóru ásettar av landsstýrinum við kunngerð nr. 7 frá 28. apríl 1971.

Endamálið við grunninum er at veita lán til íløgur í íðnaðar- og handilsfyritøkur við tí í hyggju at stuðla umskipan til broytt marknaðarviðurskifti.

Av viðmerkingunum sæst, at orsøkin upprunaliga var handilsligu viðurskifti Føroya við EFTA.

Ásettar eru fleiri reglur, ið hava til endamál at tryggja, at ansa verður eftir at tapini verða so lítil sum møguligt.

T.d. verður ásett í § 7: "at lánið ikki má vera hægri enn neiðiligt og neyðugt er eftir eini meting av møguleikunum hjá virkinum at bera seg og lívføri tess", og í § 11 í kunngerðini verður ásett, at virkir, sum fáa lán koma undir: "roknskaparligt og tekniskt eftirlit".

Lógin, reglugerðin og viðmerkingarnar leggja soleiðis upp til ein varnan og tryggan útlánspolitikk, soleiðis at vandin fyri tapi av høvuðsstólinum verður so lítil sum møguligt.

Grunnurin fekk upprunaliga eitt stovnsfæ uppá 4,5 mió. kr. og heimild at taka lán upp til 20 mió. kr. Landsstýrið hevur við kunngerðum hækkað hetta loft stigvíst til 300 mió. kr., til loftið varð avtikið í 1989, sama ár, sum ein lóg varð samtykt, ið heimilaði landsstýrinum at veðhalda upp til 40 mió. kr.

Burtursæð frá stovnsfænum hevur grunnurin ikki beinleiðis fingið játtað pening á fíggjarlógini.

Grunnurin hevur tó fingið "bílig" landskassalán úr:

- Íløgugrunni Ídnaðarins
- Fleggingargrunninum fyri Føroyar
  Oljugrunninum

Hesi lán vóru 31/12 - 1990 falt umr. 125 mió. kr.

Harumframt hevur grunnurin upptikið uttanlandslán upp á ca. 100 mió. kr., sum landskassin veðheldur fyri.

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarfrágreiðingarnar hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri árini 1986 - 1990 m.a. til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur ikki gjørt vart við serlig átaluverd viðurskifti.

Í samband við gjøgnumgongdina av roknskapunum hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Í ársroknskapunum verður nýttur ein roknskaparsiður viðvíkjandi avsetan av tapi upp á skuldarar, har avsetingarnar minka um eginognina, men ikki ávirka rakstrarúrslitið. T. d. vísir ársroknskapurin fyri 1990 eitt tap uppá 1,7 mió. kr. Um so var, at avsetingarnar vórðu førdar yvir raksturin, hevði tapið verið 16-17 mió. kr.

Sambært § 16 í kunngerðini skal tiltaksgrunnur stovnast at standa ímóti tapum av útlánum eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetir.

Landsstýrið hevur ikki ásett nærri reglur, og mælt verður til, at hetta verður gjørt í samband við, at landsstýrið ásetir nærri reglur fyri uppsetan av roknskapum og til roknskaparhættir fyri tílíkar stovnar/grunnar.

2. Eisini verður mælt til, at lóg/viðtøkur verða endurskoðaðar, so at nærri krøv til viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debittorrøkt, risikometing v. m. verða ásett.

3. Eginognin er í 1990 minkað við umleið 17 mió. kr. til uml. 35 mió. kr. Henda lutfalsliga lítla eginogn samanhildið við vaksandi eftirstøðum og tapum ger, at støðan hjá grunninum skjótt kann gerast ivasom.

4. Av roknskapunum framgongur, at morarenturnar í 1990 vóru umleið 5 mió. kr., dupult so nógv sum í 1988. Grunnurin hevur tó upplýst, at skeivt heiti er nýtt, og at tær veruligu morarenturnar í 1990 vóru ca. 6 - 700 t. kr.

5. Eftirstøðurnar viðvíkjandi falnum avdráttum og rentum eru vaksnar til knappar 50 mió. kr., nærum ein tvífalding síðani 1988. Grunnurin hevur í hesum sambandi nevnt, at ein trupulleiki er, at lántakararnir lata Ídnaðargrunnin koma í aðru røð, tá gjaldast skal, og at trupult er at fáa roknskaparligar upplýsingar.

6. Grunnurin hevur upplýst, at umleið 90% av útlánum eru tryggjað við l. veðrætti. Serliga, har talan er um veðrætt í rakstrargøgnum, er veðrættarstøðan tó ivasom í fleiri førum.

7. Sambært likviditetsætlan hjá grunninum kann hesin skjótt koma í gjaldføristrupulleikar, um so er, at ein eins lítil partur og higartil av rentum og falnum avdráttum verður goldin framyvir.

8. Mælt verður til, at landsstýrið í samstarvi við grunnin tryggjar framtíðar gjaldføri, og at rentumarginalurin í hesum viðfangi eisini verður endurskoðaður.

104. Gildissetan av lógini um innflutning og søla av rúsdrekka

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um ikki at seta lógina um innflutning og søla av rúsdrekka í gildi fyrreen vunnið er á nívandi arbeiðsloysistrupulleikanum her á landi.

Viðmerkingar:

Við hjálp av parti úr andstøðuni eydnaðist landsstýrisflokkunum sum kunnugt við teprum meiriluta at fáa samtykt nýggja lóg um innflutning og søla av rúsdrekka.

Royndir vísa, at jústt slíkar broytingar, sum nú eru framdar, gera at rúsdrekkanýtslan hækkar, og harvið skaðarnir á einstaklingin, familjur og samfelagið sum heild økjast.

Hóast hetta er vísindaliga prógvað, og at hagtøl greidliga lýsa, at so er, hevur tað verið sum at sletta vatn á gás at fáa menn at skilja, at so er, og vórðu hesi sjónarmið tíanverri ikki tikin til eftirtektar nú nýggj lóg varð smíðað og samtykt her á tingi.

Nú tá lógin er samtykt, er tað óivað rætt at reisa spurningin - sum ov lítið hevur verið frammi í kjakinum - um tað ikki er skilagott at bíða við at seta lógina - ella partar av henni - í gildi - inntil samfelagsstøðan her á landi aftur er "normaliserað"?

Sera óheppi má tað metast at vera at seta eina slíka lóg í verk, meðan tjóðin er í einum sosialum "alkhodali", og arbeiðsloysið kennist sum ein nívandi gestur hjá mongum og rakar mangt eitt húski meint.

Eitt er at ivast í, at hesir álvarsligu samfelagstrupulleikar við arbeiðsloysi er gróðrarbotnur fyri sosialum og menniskjaligum sorgarleikum, og í hjalarvørrinum av hesum er gáttin til økta rúsdrekkanýtslu sera lág.

Tí er tað rættast ikki at seta lógina í gildi, fyrr enn vunnið er á hesum álvarsligu samfelagstrupulleikum, sum ikki bert kunnu skúgvast til síðis, tá hugsað verður um viðurskifti, ið so avgjørt økja um rúsdrekkanýtsluna og harvið avleiðingarnar á einstaklingar, familjur og samfelagið sum heild.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 104/1991: Gildissetan av lógini um innflutning og sølu av rúsdrekka.

Málið er lagt fram av Tordur J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 28. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 24. mars beint í ræittarnevndina.

Í uppskotinum verður mælt til, at lógin um innflutning og sølu av rúsdrekka ikki verður sett í gildi, fyrrenn arbeiðsloysistrupulleikarnir eru loystir.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og leggur nevndin dent á, at landsstýrið hevur øll samfelagsviðurskifti í huga, tá lógin verður sett í gildi. Nevndin setir annars eingi uppskot fram.

105. Broyting í løgtingsvallógini

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgting, sum broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 5. mai 1987, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 2 a verður innsett:

"Persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttanfyri Føroyar, hava valrætt til løgtingið, um teir annars lúka treytirnar í § 2.

Stk. 2. Teir í stk. 1 nevndu persónar hava tó bert valrætt, um so er, at teir frammanundan fráflyting úr Føroyum hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum í minsta lagi 5 ár tilsamans."

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om valg til Færøernes Lagting.

§ 1.

I lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes Lagting, som ændret ved lagtingslov nr. 42 af 5. maj 1987, foretages følgende ændringer.

1) Som ny § 2 a indsættes:

"Personer, der opholder sig uden for Færøerne i uddannelsesøjemed, har valgret til lagtinget, hvis de iøvrigt opfylder betingelserne i § 2.

Stk. 2. De i stk. 1 nævnte personer har dog kun valgret, såfremt de forud for flytningen fra Færøerne har været registreret i folkeregisteret på Færøerne i mindst 5 år ialt."

2) Sum nýggj § 8 a verður innsett:

"Veljarar, sum koma undir reglurnar í § 2 a, verða settir á vallista í teirri kommunu, har teir seinast hava staðið skrásettir í fólkayvirlitinum. Áheitan um upptøku á vallistan skal sendast hesi kommunu. Áheitanin skal skrivast á oyðiblað, ið er góðkent av landsstýrinum. Avgerðir um upptøku á valistan eru galdandi í 2 ár um ferðina frá avgerðardegnum at rokna.

Stk. 2. Veljarar, ið hava havt tilhald uttan fyri Føroyar í meira enn 8 ár, kunnu ikki koma á vallista eftir § 2 a.

Stk. 3. Landsstýrið ásetir nærri reglur um upptøku á vallista av veljarum eftir § 2 a."

2) Som ny § 8 a indsættes:

"Vælgere, der er omfattet af bestemmelserne i § 2 a, optages på valglisten i den kommune, hvori de sidst har været tilmeldt folkeregisteret. Begæring om optagelse på valglisten skal indgives til denne kommune. Begæring skal skrives på en formular, der er godkendt af landsstyret. Afgørelser om optagelse på valgliste er gældende i 2 år ad gangen fra afgørelsens dato.

Stk. 2. Vælgere, der har haft ophold uden for Færøerne i mere end 8 år, kan ikke optages på valgliste i henhold til § 2 a.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter nærmere regler om optagelse på valglisten af vælgere, i henhold til § 2 a."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Meginfelag Føroyska Studenta hevur heitt á Føroya Løgting og Føroya Landsstýri um at skipa so fyri, at føroyingar í útbúgving uttanlands fáa valrætt til Føroya Løgting.

Eftir stýrisskipanarlógini og løgtingsvallógini er ein av treytunum fyri valrætti, at ein hevur fastan bústað í Føroyum.

Eftir § 2 í løgtingsvallógini verða løgtingsvallistarnir gjørdir við fólkayvirlitinum sum grundarlag, og er tað tí neyðugt fyri at kunna koma á vallistan og harvið fáa rætt at velja, at ein er tilmeldaður fólkayvirlitinum í Føroyum.

Eftir § 29, stk. 1 í grundlógini er m.a. ein av treytunum, at ein hevur fastan bústað í ríkinum. Hetta hevur ikki verið mett sum nøkur forðing fyri, at tað í fólkatingsvallógini verður givið fólki valrætt, sum fyribils hava tilhald uttanlands í útbúgving. Eisini í fólkatingsvallógini fyri Føroyar § 29 er gjørligt hjá føroyingum í útbúgving uttanfyri Føroyar at luttaka í fólkatingsvali í Føroyum.

Mett verður sostatt ikki, at tað er í stríð við kravið í § 12 í stýrisskipanarlógini um fastan bústað í Føroyum, at veittur verður føroyingum, við fyribils tilhaldi uttanfyri Føroyar, rætt at atkvøða til løgtingsval.

Mett verður, at einir 2.000 føroyingar eru í útbúgving uttanlands, og at teir flestu av hesum kunnu metast at hava valrættaraldur.

Hjá Studulsstovninum eru skrásettir 1.723 føroyingar í útbúgving uttanlands, harav 10% eru undir valrættaraldur.

Hvussu nógvir føroyingar í útbúgving uttanlands vilja nýta rættin til at fáa valrætt í Føroyum, er ikki gjørligt at meta um frammanundan. Viðmerkjast kann, at eingin føroyingur uttanlands hevur sett fram áheitan um at koma á vallista til fólkatingsval í Føroyum, síðani lógarbroytingin fór fram, sum gjordi hetta møguligt í 1986.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

§ 1, nr. 1: Broytingin gevur føroyingum í útbúgving uttan fyri Føroyar valrætt til løgtingsval, men ikki valbæri. Greinin fevnir um allar útbúgvingar, bæði langar og stuttar, og eisini um útbúgvingar, sum gjørligt er at fáa í Føroyum. Uppihald uttanlands fyri at læra mál, verður eisini at meta sum útbúgving, t.d. uppihald uttanlands sum "au-pair"-genta.

Uppihald uttan fyri Føroyar aftaná eina lokna útbúgving til tess at læra fremmand viðurskifti at kenna kann ikki roknast sum tilhald uttanlands í útbúgving. Kravið um bústað í Føroyum í 5 ár ella meira nýtist ikki at hava verið samanhangandi ella beint frammanundan, at ein fer uttanlands í útbúgving.

Ad § 2, nr. 2: Veljarar skulu upptakast á vallista í teirri kommunu, har teir seinast vóru skrásettir í fólkayvirlitinum, áðrenn teir fluttu úr Føroyum, sjálvt um ein bara hevur búð í avvarðandi kommunu í stutta tíð. Fráboðanin er galdandi í 2 ár, og um ein ynskir framhaldandi at standa á vallistanum, kann nýggj áheitan við neyðugum prógvtilfari aftur sendast kommununi. Í § 8 a, stk. 2 er áseta, at veljarar, ið hava havt tilhald uttan fyri Føroyar í meira enn 8 ár, ikki kunnu koma á vallista í Føroyum eftir hesum reglum. Tær longstu útbúgvingarnar vara í mesta lagi 8 ár, og annars má haldast, at tá ein hevur verið so leingi burtur úr Føroyum, ikki kann sigast at hava tað neyðuga tilknýtið til Føroyar fyri framhaldandi at hava valrætt til løgtingið.

Eftir § 8 a, stk. 3 kann landsstýrið áseta nærri reglur um upptøku á vallista eftir § 8 a. Kunngerðin kemur m.a. at áseta, hvørjar upplýsingar og váttanir skulu fylgja við áheitanum, freistir fyri innsending av áheitanum og um, hvussu kommununar skulu viðgera áheitanirnar.

Viðlagt fylgja ummælir í málinum frá Føroya Kommunufelag og Tórshavnar Býráð.

Álit

frá

Løgtingsmáli nr. 105/1991: Broyting í løgtingsvallógini.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1992 beint til viðgerðar í rættarnevndini.

Endamálið við uppskotinum er at broyta løgtingsvallógina soleiðis, at føroyingar í útbúgving uttanlands kunnu fáa valrætt til Føroya løgting. Málið er lagt fram eftir áheitan frá Meginfelag Føroyskra Studenta, og hevur landsstýrið kannað tær løgfrøðiligu avleiðingarnar av broytingini. Landsstýrið er komið til ta niðurstøðu, at tað ikki er í stríð við kravið í § 12 í stýrisskipanarlógini um fastan bústað í Føroyum, at veitfur verður føroyingum við fyribils tilknýti uttan fyri Føroyar atkvøðurætt til løgtingsval.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Birgir Danielsen, Bjarni Djurholm og Signar Hansen) tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

Tún minnluti (Lisbeth L. Petersen) tekur støðu í tingsalinum.

106. Broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum verða gjørdar hesar broytingar:

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om sygdomme hos fisk, skaldyr og krebsdyr.

§ 1.

I lagtingslov nr. 26 af 30. april 1987 om sygdomme hos fisk, skaldyr og krebsdyr foretages følgende ændringer:

1) Í § 7 verða stk. 3, 4, 5 og 6 strikað, og sum nýtt stk. 3 verður sett:
"Endurgjald verður ikki veitt, tá fiskur, skeljadýr ella krabbadýr verða avlívað eftir boðum landsdjóralæknans". Stk. 7 verður stk. 4.
2) § 8 verður strikað.
3) § § 9, 10, 11 og 12 verða §§ 8, 9, 10 og 11.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

1) I § 7 udgår stk. 3, 4, 5 og 6. Som nyt stk. 3 indsættes:
"Erstatning ydes ikke, når fisk, skaldyr eller krebsdyr aflives efter landsdyrlægens ordre." Stk. 7 bliver stk. 4.
2) § 8 udgår.
3) §§ 9, 10, 11 og 12 bliver §§ 8, 9, 10 og 11.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Ongin endurgjaldsgrunnur er enn komin at virka, sum skal veita endurgjald í samband við, at alifiskur verður avlívaður eftir boðum landsdjóralæknans. Av tí at landskassin ikki einsamallur kann bera endurgjald í samband við sjúku, er neyðugt at gera eina broyting í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987, um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum, og taka tær greinirnar, har endurgjaldsgrunnurin er nevndur, úr lógini.

Upprunaliga ætlanin var at seta á stovn ein trygdargrunn, har vinnan og tað almenna skuldi gjalda. Hetta broytti ein samd Ídnaðarnevnd til ein endurgjaldsgrunn, har fíggjarliga grundarlagið bert var játtanin á fíggjarløgtingslógini.

Í samband við viðgerðina av uppskotinum um endurgjald í samband við furunkulosu (løgtingsmál nr. 107/1988) var gamla uppskotið um trygdargrunn tikið fram aftur og síðani sum løgtingsmál nr. 19 og 20/1989.

Á fundi við vinnuna heystið 1991 varð borið uppá mál at fáa endurgjaldsgrunnin at virka, soleiðis at vinnan ber ein part av útreiðslunum. Hetta sýtti Havbúnaðarfelagið fyri og metur landsstýrið sostatt onga orsøk vera fyri at hava nakran endurgjaldsgrunn.

Sostatt verður mælt til, at tær greinirnar, sum hava við endurgjald at gera, verða tiknar úr lógini, og sum nýtt stk. 3 kemur at standa, at endurgjald ikki verður veitt í samband við, at landsdjóralæknin gevur boð um avlíving. Hereftir verður tað alarin sjálvur, sum má greiða spurningin um endurgjald við tryggingarfelag, soleiðis, sum tað verður gjørt í øðrum londum, t.d. Noregi.

Um so er, at alararnir seinni broyta støðu, er møguligt at taka spurningin upp í serligari lóg.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 106/1991: Broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 18. mars 1992 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og m. a. havt fund við Áka Mortensen, landsdjóralækna. Hann greiddi frá, at uttan mun til, um endurgjald fæst fyri smolt og fisk, so kann tað verða rætt at geva boð um at avlíva fisk av tí, at ov stórur vandi er fyri størri missi við at lata vera. Tað eru sjúkur, sum eru í fiski á sjónum, t. d. furunkolosa, men sum rætt er at fyribyrgja, at hon kemur í fisk á landi. Tað kunnu vera sjúkur, sum vit noyðast at liva við (í fiskinum), men álvarsamar sjúkur kunnu stinga seg upp, sum ger, at rætt er at bava heimild til at avlíva. Annars verður gjørt eitt størri arbeiði við at fylgja við, um sjúkur stinga seg upp, og eisini við at kanna betri, serliga smolt, um sjúka kunnu vera í fiskinum, áðrenn hon er brotin út.

Ábyrgdarkenslan er yvirhøvur góð, tó má sigast, at sinitta er flutt frá einum øki í annað av ósketni, og eigur hetta at takast sera álvarsligа, tá ið vit vita, hvussu álvarsligar fylgjurnar eru.

Eisini vóru umboð fyri smolt- og sjógvalarar á fundi við nevndina. Teir førdu fram, at alararnir ikki vóru fegnir um, at endurgjaldsgrunnurin verður tikin út úr lógini. Teir søgdu, at tað var misskilt, at vinnan ikki vildi bera ein part av útreiðslunum, men tað var enn ikki eydnast teimum at skipa seg soleiðis, at greiða var fingin á, hvussu teirra partur skuldi rindast.

Teir hildu annars, at tað fór at verða sera óheppið, um lógin fór at geva heimild til at geva boð um at drepa, uttan at endurgjald kundi veitast, tí tá kvíddu teir fyri, at nakar, sum hevði sjúkan fisk, fór at boða frá.

Annars varð tosað um tryggingarspurningar í breiðari merking, og niðurstøðan varð, at rætt var at taka allar tryggingarspurningar upp og vita, um til bar at samansjóða vanliga trygging við endurgjald orsakað av boðum um avlíving.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við teirri broyting, at lógin fær gildi frá 31. desember 1992 og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 2 verður soljóðandi:

"Henda lóg fær gildi 31. desember 1992".

§ 2 formuleres således:

"Denne lov træder i kraft 31. december 1992".

Ein samd nevnd tekur undir við § 1 í uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja hana.

107. Yvirføring av føroyskari toskakvotu á NAFO-økinum til grønlendsk skip

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir semju millum grønlendskar og føroyskar fiskiveiðumyndugleikar um, at 3 føroysk línuskip, sum hava fingið tillutað kvotu á Flemish Cap, lata 750 tons av toski til grønlendsk skip í býti við, at hesi 3 skip fáa loyvi at luttaka í einari grønlendskari royndurætlan fyri línuskip í Eysturgrønlandi. Harumframt kunnu 2 føroysk skip aftrat taka lut í hesi royndarætlan. Nærri treytir um royndarfiskiskapin verða avtalaðar, áðrenn loyvini verða givin.

Viðmerkingar:

Á samráðingarfundi í Stockholm hin 30. januar 1992 millum grønlendskar og føroyskar fiskiveiðumyndugleikar var semja gjørd um, at 3 føroysk línuskip, sum hava fingið kvotu á NAFO- økinum við Flemish Cap, lata 750 tons av toski til grønlendsk skip í býti við, at hesi somu skip koma við í grønlendsku ætlanina "Linebåde Østgrønland". Grønlendsku myndugleikarnir hava sostuleiðis játtað, at í minsta lagi 2 føroysk línuskip aftrat koma við í ætlanina eftir nærri avtalu millum Reiðarafelagið og Royal Greenland.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 107/1991: Yvirføring av føroyskari toskakvotu á NAFO-økinum til grønlendsk skip.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 19. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur eisini havt fund við John Petersen, landsstýrismann. Hann hevur á fundi í Stockholm tann. 30. januar 1992 millum grønlendskar og føroyskar fiskivinnumyndugleikar verið við til at gjørt semju um, at minst 5 føroysk skip kunnu veiða tosk við Eysturgrønland. Spurdur, hvørt føroysk skip vóru avmarkað til at veiða tað, sum grønlendsku skipini kundu veiða á Flemish Cap, ella hægst 750 tons, ella óavmarkað, upplýsti John Petersen, at tey 750 tonsini á Flemich Cap eru í býti við 750 tons í Eysturgrønlandi. Um hesi verða veidd, og ikki tey á Flemish Cap, er restkvotan tøk hjá føroyskum skipum.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

108. Ríkisrættarligu viðurskifti Føroya

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið velur eina 5-manna serkøna nevnd til at kanna ríkisrættarligu avleiðingarnar, ið standast Føroya vegna av teirri fólkaatkvøðu, ið verður í Danmark 2. juni 1992. nevndararbeiðið skal kunnast løgtinginum innan 1. mai.

Viðmerkingar:

Tann 2. juni í ár skal danska fólkið við eina fólkaatkvøðu taka støðu til framtíðar viðurskifti Danmarkar við EF. Sjálv fólkaatkvøðan er søgd at vera løgfrøðiliga á markinum fyri, um tað ber til at gera hetta av við fólkaatkvøðu, ella um ein grund lógarbroyting skal til.

Frá Maastricht fundinum 11. december í fjør liggur drúgv greinagerð, sum danska fólkið kemur at góðtaka ella vraka. Fólk flest eru ikki før fyri at meta um innihaldið og avleiðingarnar av hesum verki, og er tað tí litið upp til politikarar-nar at tamba henda tekstin ymsar vegir, alt eftir hvønn veg teir vilja hava fólkið at fara.

Frá flokkinum á fólkatingi og frá álítandi keldum innan almenman og privatan løgfrøðikunnleika í Danmark ljóðar, at fólkaatkvøðan komandi onga heimild hevur í grundlógini, m. a. tí, at tað ikki er nærri lýst innan hvørji øki og í hvussu stóran mun, ið vald verður latið frá statinum til EF.

M. a. vísandi til, at tað frá danskari síðu verður sagt, at yvirtøka av undirgrund-ini á føroyskar hendur ikki kann góðtakast, tí at hon stríðir móti "statens over-højhedsret", so er tað ikki óhugsandi, at ríkisrættarligu viðurskifti Føroya kunnu enda í EF-høpi vísandi til, at ríkið avhendir so at siga allan myndugleika víðari til EF.

Fordømi um at ein sáttmáli verður galdandi uttan at føroyingar verða spurdir, fingu vit við NATO-sáttmálanum frá 3. december 1952. Seinni varð sagt av donsku stjórnini, at ásetingarnar í heimastýrislógini um kunning av málum fyri føroy-ingum ikki tók av eldri danska lóg frá 1986.

Eftir líknandi mannagongd kann komandi hernaðarfelagsskapurin WEU gerast galdandi fyri Føroyar. Eftir hesum sáttmála er so hugsandi, at ungir føroyingar skrivast út til hernaðartænastu í tí krígsherjaða Eystureuropa.

Danskur uttanríkispolitikkur verður lagdur undir eina 13 manna juntu, sum er sett saman av ríkisleiðarunum og kommissiónsformanninum.

Føroyskur uttanríkispolitikkur er ikki til sum er, men liggur undir donskum uttan-ríksipolitikki, sum nú verður loraður inn í EF.

Danir eru av teirri fatan, at danskur uttanríkispolitikkur m.a. umfatar veldugu havøkini í Norður- og Vesturatlantshavi, har føroyingar og grønlendingar búleik-ast.

Fólkaatkvøðan fer at leggja hesi øki undir EF-ræði.

Á ólavsøku í fjør segði landsstýrið seg vera av teirri hugsan, at broytingar í ríkiseindini var eitt sera álvarsligt mál, og varð tað tí í seinastu løgmansrøðu boðað frá, at landsstýrið fór at lýsa veruligu støðu Føroya í nýggjari sjálvstýris-lóg, nú so nógv hendir stýrisskipanarliga í Europa.

Um dagarnar frættist, at spónur ikki enn er settur í greytin hesum viðvíkjandi.

Tá einki frættist frá landsstýrinum, nú løgtingssetan er um at enda, so er neyð-ugt, at løgtingið sjálvt tekur um endan og skipar fyri at útvega kunnandi tilfar, um tey vandamál, ið standast Føroya vegna av donsku fólkaatkvøðuni, áðrenn hon fer fram.

Tøgn á tingi kann lættliga tulkast sum góðtøka av samtyktini á Maastricht fundinum við komandi fólkaatkvøðuna í Danmark.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 108/1991: Ríkisrættarligu viðurskifti Føroya.

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 10. mars 1992 og undir 1. viðgerð 19. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Olaf Olsen, Sverre Midjord, Heini Johansen, Birgir Danielsen og Edmund Joensen) førir fram, at tað verður torført at fáa nakað álit frá einari nevnd, sum ikki er sett enn, áðrenn 1. mai, serliga tá ið vit vita, at páskirnar liggja ímillum.

Hinvegin er rætt at fáa at vita so væl sum gjørligt um støðu Føroya, um Danmørk atkvøður fyri at gerast partur av EF-samveldinum.

Vit fara at heita á løgmann um at geva løgtinginum so góða kunnan sum gjørligt um hesi viðurskifti og vóna, at hann kann gera tað, so Føroya Løgting og Føroya fólk veit, hvørjar avleiðingar tað fær fyri okkum, um Danmørk gerst partur av EF-samveldinum.

Marknaðarnevndin er sinnað at fáa fund við donsku marknaðarnevndina fyri at kunna seg betur um hesi viðurskifti. Tað kann vera skilagott, at hesar nevndir tosa saman, tí óivað hava tær báðar breiðari áskoðanir hesum viðvíkjandi enn landsstýrið og danska stjórnin.

Út frá hesum tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Hergeir Nielsen) mælir tinginum til at taka undir við uppskotinum. Vil tingið ikki taka undir við, at vit fáa so neyvan kunnleika til størstu politisku meginhending í okkara tíð, sum gjørligt, áðrenn avgerðir verða tiknar, og sum frægast verja okkum móti avleiðingunum, so átti tingið ongantíð at verið valt.

Sum ein snarloga hevur eitt sovandi landsstýri lagt eitt uppskot á ting í eini roynd at taka broddin av hesum máli. Danska lógaruppskotið um "Fólkaatkvøðu um broytingar í EEC-sáttmálanum," hevur smoygt sær við fráviki gjøgnum tingskipanina. Er framlagt, viðgjørt og samtykt, meðan uppskot Tjóðveldisfloksins um at kanna avleiðingar hevur ligið í marknaðarnevndini.

Uppskot landsstýrisins, um at boða ríkisstýrinum frá at vit uttan viðmerkingar ikki eru sinnaðir at taka lut í fólkaatkvøðuni, byggir ikki á nakra vitan um hetta mál, tí landsstýrið sigur jú sjálvt í viðmerkingunum, at tað "fer" at kanna málið.

Sostatt er málið ikki kannað, og kortini hevur alt løgtingið uttan Tjóðveldisflokkurin glaðbeint tikið støðu til eitt mál, sum hvørki tað ella landsstýrið kennur fylgjurnar av.

Í øllum Europa og í øllum norðanlondum verður Maastrichtsáttmálin kannaður og umrøddur í fólkavaldum tingum, nevndum, almennum og privatum tjølmiðlum og millum manna. Allastaðni verður stór orka løgd í at upplýsa fólkið um hetta mál, sum skal tigast burtur í Føroyum.

Sami meiriluti, sum ikki so frægt sum tók hetta mál til umrøðu við 1. viðgerð, sum samtykkir danska lógaruppskotið um onga fólkaatkvøðu í Føroyum, hevur nú eisini samtykt, at ein komandi føroysk umboðsstova í Bruxelles skal verða knýtt at einari aðrari EF-umboðsstovu, teirri donsku.

Sigast kann tí, at greiðar ábendingar koma úr Føroyum um, at Føroyar nærkast EF mest møguligt, og so friðarliga sum gjørligt.

Um løgtingið ikki samtykkir hetta uppskot, so hevur løgtingið samtykt, at tað lítið og einki skal vita í hesum máli, fyrr enn ov seint er. Hetta verður ein søgulig hending, sum kemur at gera greiðan skilnað millum Føroya Løgting og onnur fólkavald ting, har fremsti áhugin altíð hevur verið at náa einum optimalum kunnleikastøði í øllum málum.

Mælt verður løgtinginum til at sleppa sær burtur úr húskallastøðu síni og ikki at lata seg stýra av einum landsstýri, sum hevur sína fremstu styrki í at lata tinginum so fáar upplýsingar sum gjørligt fyri sjálvt at standa sterkari.

Tikið verður undir við, at marknaðarnevndin kannar málið, men tað tekur ikki grundarlagið undan verandi uppskoti. Tvørturímóti vilja bæði tiltøkini styrkja hvørt annað.

Ein annar minniluti (Tordur J. Niclasen) tekur støðu í tingsalinum.

109. Løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgving og aðrar maskin- og eltøkniútbúgvingar

Uppskot

til

Løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgving og aðrar maskin- og eltøkniútbúgvingar.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at reka skúla og venjingarskip til fremjing av

Lagtingslov om maskinuddannelse og andre maskin- og elteknikuddannelser.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at drive skole og øvelsesskib til gennemførelse

teimum útbúgvingum, sum eru nevndar í 3.

§ 2.

Landsstýrið setir útbúgvingarráð fyri útbúgvingar sambært hesi lóg og ger reglugerð fyri virki tess.

§ 3.

Á maskinskúla kunnu fara fram hesar útbúgvingar:

1) Dugnaskaparútbúgving í motorpassing,
2) motorpassaraútbúgving,
3) maskinmeistaraútbúgving,
4) elinnleggjaraútbúgving og sterkstreymsteknikaraútbúgving.

Stk. 2. Eftirútbúgving í teimum útbúgvingum, sum eru nevndar í stk. 1, pkt. 1)-4) og royndarútbúgvingar kunnu eisini fara fram á maskinskúla.

Stk. 3. Fyrireiking og prógtøka til dugnaskaparútbúgving í motorpassing og motorpassaraútbúgving eins og eftirútbúgving sambært stk. 2 kunnu eisini fara fram á øðrum skeiðum eftir góðkenning frá Landsskúlafyrisitingini.

§ 4.

Næmingarnir skulu fáa ein part av undirvísingini umborð á venjingarskipi og við simulatori.

§ 5.

Landsskúlastjórin skipar fyri prógtøkuni.

Stk. 2. Til prógtøkuna verða havdar skrivligar og munnligar royndir við prógdómarum, sum landsskúlastjórin útnevnir. Prógdómarar í maskin- og el-

af de uddannelser, der er nævnt i § 3.

§ 2.

Landsstyret nedsætter et uddannelsesråd for uddannelser, der er omfattet af denne lov, og udsteder et reglement for dets virksomhed.

§ 3.

På maskinskole kan disse uddannelser foregå:

1) Duelighedsuddannelse i motorpasning,
2) motorpasseruddannelse,
3) maskinmesteruddannelse,
4) elinstallatøruddannelse og stærkstrømsteknikeruddannelse.

Stk. 2. Efteruddannelse i de uddannelser, der er nævnt i stk. 1, pkt. 1) - 4), og forsøgsuddannelser kan også foregå på maskinskole.

Stk. 3. Forberedelse og eksamen til duelighedsuddannelse i motorpasning og motorpasseruddannelsen såvel som efteruddannelse i medfør af stk. 2 kan også foregå på andre kurser efter godkendelse fra undervisningsdirektoratet.

§ 4.

Eleverne skal have en del af undervisningen ombord på øvelsesskib og med simulator.

§ 5.

Undervisningsdirektøren forestår eksamen.

Stk. 2. Ved eksamen afholdes skriftlige og mundtlige prøver med censorer, som undervisningsdirektøren udpeger. Censorer i maskin og elfag skal have

lærtu skulu hava hægsta maskinmeistaraprógv ella samsvarandi prógv.

Stk. 3. Landsskúlastjórin gevur teimum, ið staðið hava prógvtøkuna, prógvbræv.

§ 6.

Landsstýrið ásetir nærri reglur um:

a) treytir fyri upptøku á maskinskúla,

b) undirvísingarskipan, lærukrøv og lærugreinir,

c) prógvtøkuhald, herundir krøv til tær einstøku prógvtøkurnar, prógvtalsgeving og prógvdøming,

d) útbúgvingarkrøv til lærarar.

§ 7.

Maskinskúlin skal tryggja næmingar móti óhappi undir sigling við venjingarskipi og bjargingarroynd og á eldsløkkingarskeiði.

§ 8.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. august 1992.

højeste maskinmestereksamen eller tilsvarende eksamen.

Stk. 3. Undervisningsdirektøren udsteder eksamensbevis til den, der har bestået eksamen.

§ 6.

Landsstyret fastsætter nærmere regler om:

a) betingelser for optagelse på maskinskole,

b) undervisningens tilrettelæggelse, pensumkrav og fag,

c) eksamenernes afholdelse, herunder krav til de enkelte eksaminer, karaktergivning og censur,

d) uddannelseskrav til lærere.

§ 7.

Maskinskolen skal forsikre eleverne mod ulykker under sejlads med øvelsesskib og redningsforsøg og på brandbekæmpelseskursus.

§ 8.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. august 1992.

Viðmerkingar:

Tann 1. mars 1965 byrjaði Føroya Maskinskúli.

Fyrst varð farið undir skeið til maskinistprógvtøku, ið samstundis var fyrireikingarskeið til maskinmeistara. Síðan varð farið undir skeið til føroyska maskinistprógvið. Hetta var ein innanskúlaroynd, sum næmingarnir kundu taka eftir at hava gingið í eitt hálvt ár á maskinmeistaraskeiðnum. Seinasta føroyska maskinistroyndin varð hildin í januar 1972.

Í 1972 kom lóg nr. 197 frá 24. mai 1972 "Om uddannelse af maskinister og maskinmestre" í gildi í Danmark. Útbúgvingin eftir hesi lóg varð sundurbýtt í 3 fylgjandi prógvtøkur: maskinistprógvtøku, maskinmeistaraprógvtøku og víðkaða maskinmeistaraprógvtøku.

Hóast lógin ongantíð varð sett í gildi í Føroyum, hevur síðan 1972 verið undirvíst eftir henni til maskinist og maskinmeistara. Víðkaða maskinmeistaraprógvið

noyddust føroyingar tó í mong ár at fara til Danmarkar at taka: men í 1987 gjørdi landsstýrið av, at seinasta árið eisini skuldi kunna takast í Føroyum.

Lógin "Om uddannelse af maskinister og maskinmestre" varð sett úr gildi í Danmark við nýggjari lóg nr. 350 frá 1. juli 1988.

Eftir hesi lóg er maskinmeistaraútbúgvingin ein 3-ára samanhangandi útbúgving, sum endar við maskinmeistaraprógvtøku. Lógin er ikki sett í gildi í Føroyum, men kortini er farið yvir til nýggju, donsku skipanina. Maskinmeistaraútbúgvingin eftir hesi lóg er á sama støði og gevur somu rættindi sum víðkaða maskinmeistaraútbúgvingin.

Á sumri 1988 varð nevnd vald, ið fekk tann arbeiðssetning at fyrireika løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgving.

Tann 25. mai 1990 varð løgtingslógaruppskot um maskinmeistaraútbúgving lagt fyri tingið og eftir fyrstu viðgerð beint í mentanar- og skúlanevndina, sum varð gjørd til miðlumtinganevnd. Men tað eydnaðist ikki at fáa málið aftur á tingborð, áðrenn tingið varð upployst og val útskrivað.

Uppskotið um maskinmeistaraútbúgving varð lagt fram av nýggjum tann 18. januar 1991 av Signari Hansen, løgtingsmanni, og eftir fyrstu viðgerð beint í mentanar- og skúlanevndina.

Meirilutin í nevndini samtykti at mæla tinginum til í staðin fyri lógaruppskotið at samtykkja soljóðandi uppskot til samtyktar:

"Løgtingið heitir á landsstýrið um skjótast møguligt at leggja lógaruppskot um føroysku maskinskúlaútbúgvingina fyri løgtingið."

Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í mentanar- og skúlanevndini varð samtykt á løgtingi 24. apríl 1991 við 23-0 atkvøðum.

Síðani hevur landsstýrið arbeitt við uppskoti til løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgving og aðrar maskintøkni- og eltøkniútbúgvingar.

Landsstýrið hevur saman við Landsskúlafyrisitingini havt fund um nýggja lógaruppskotið við umboð fyri leiðslu Maskinskúlans, lærarar, næmingar og Maskinmeistarafelagið. Hesir tóku á fundinum undir við uppskotinum, men tað stóð teimum í boði at gera skrivligar viðmerkingar til lógaruppskotið. Næmingarnir hava sent skrivligar viðmerkingar, og eru hesar viðlagdar sum skjal til lógaruppskotið.

Eftir uppskotinum verður skipað fyri hesum útbúgvingum:

1. Dugnaskaparútbúgving í motorpassing
2. Motorpassaraútbúgving
3. Maskinmeistaraútbúgving
4. El-innleggjaraútbúgving og sterkstreymsteknikaraútbúgving.

Tær útbúgvingar, sum eru nevndar undir pkt. 1) - 3), elinnleggjaraútbúgvingin og sterkstreymsteknikaraútbúgvingin undantiknar, eru kravdar til tess at fáa før-

leika sambært løgtingslóg nr. 16 frá 3. mars 1988 um sjóvinnu og rættindi eftir løgtingslóg nr. 5 frá 15. januar 1988 um manning av skipum. Útbúgvingarnar samsvara altjóða krøvunum ásett í STCW-sáttmálanum frá 1984 um útbúgving, um sjóvinnubrøv og vaktarhald á skipum, sum er lýstur at galda í Føroyum við gildi frá 18. september 1990.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1:
Ætlanin er, at tað samstarv um venjingarsigling, sum í dag er, við Vaktar- og Bjargingartænastuna, heldur fram, ella at aðrir útvegir finnast.

Til § 2:
Ætlanin er, at útbúgvingarráðið skal hava 8 limir og verða soleiðis samansett, at

eitt umboð verður fyri maskinmeistarar á landi,
eitt umboð fyri maskinmeistarar á sjónum,
eitt umboð fyri Motorpassarafelagið, eitt umboð fyri Føroya Reiðarafelag,
eitt umboð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag,
eitt umboð fyri Føroya Handverkarafelag og
tvey umboð fyri Føroya Handverksmeistarafelag, harav annað umboðið er góðkendur elinnleggjari.

Til § 3, stk. 1, nr. 1:
Dugnaskaparútbúgvingin tekur 150 tímar og gevur rætt til at passa upp til 450 KW motormegi.

Til § 3, stk. 1, nr. 2:
Motorpassaraútbúgvingin tekur 5 mánaðir og gevur loyvi til at passa upp til 750 KW motormegi.

Til § 3, stk. 1, nr. 3:
Útbúgvingin verður ein 3 ára samanhangandi útbúgving, sum endar við maskinmeistarapróvtøku. Henda maskinmeistarapróvtøkan gevur sonn rættindi sum gamla víðkaða maskinmeistaraprógvið, men er betur tillagað tí tekniska framburðinum.

1. árs royndin verður tólv mánaðir + eykaskeið, sum liggja inni í fyrsta árinum, og 1. árs royndin gevur rættindi til vinnubrævv sum maskinistur á 1. og 2. stigi og gevur rætt til at passa motor upp til 3000 KW.

Frálæran til 1. árs royndina verður skipað soleiðis, at hon lýkur tey krøv, sum altjóða sáttmálin um útbúgving, um sjóvinnu og vaktarhald á sjónum, STCW sáttmálin, setur til ta ástøðiligu útbúgvingina.

Til § 4:
Endamálið við simulatorvenjing er at gera næmingarnar betur førar fyri at fara umborð á skip og samstundis stytta um siglingartíðina fyri at lúka siglingarkrøvini til vinnubrævið.

Til § 5:
Landsskúlastjórin skipar fyri prógtøkuni, og er hetta í samsvari við reglugerðina fyri landsskúlastjóran nr. 3 frá 2. januar 1980 § 2, stk. 2. Landsskúlastjórin er í fyriskipanini av prógtøkuni bundin av ásetingini í § 5, stk. 2.

Til § 6:
Undirvísingarstøðið í øllum útbúgvingunum skal í minsta lagi lúka krøvini, sum eru ásett í STCW-sáttmálanum. Motorpassaraútbúgvingin verður broytt samsvarandi rættindunum yvir og undir 750 KW.

Maskinmeistaraútbúgvingin skal vera á minst sama støði sum nú, soleiðis at útbúgvingin eisini í framtíðini gevur rætt til sjóvinnubrævi á sama støði sum nú. Í hesum sambandi verður vist til avtalu millum landsstýrið og Søfartsstyrelsen, dagfest 19. juli 1989, um javnseting av sjóvinnubrøvum og kunngerð nr. 456 frá 23. juni 1989 frá ídnaðarmálaráðnum um javnseting av sjóvinnubrøvum v.m. og "Aftale mellem Landsskúlafyrisitingin og Søfartsstyrelsen" dagfest 15. august 1990 um samstarvsavtalu um prógtøkur, sum er hjálagt sum skjal 2.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 109/1991: Løgtingslóg um maskinmeistaraútbúgving og aðrar maskin- og eltøkniútbúgvingar.

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

110. Stovnsetan av føroyskari viðskiftastovu og setan av føroyskum umboðsmanni í Bruxelles

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at seta á stovn føroyska viðskiftastovu og seta føroyskan umboðsmann í Bruxelles, sum kann røkja áhugamál okkara við EF-londini og veita vinnulívinum allar neyðugar upplýsingar í samhandli okkara og samskifti við hesi lond.

Viðmerkingar:

Heili 70% av útflutningi okkara er í løtuni til londini í EF.

Í landilsavtalan, ið gjørd er við hesi lond, miðar ímóti at fáa økt samhandilin og fáa útvegað føroyskaum fiskavørum betri møguleikar innan hendla stóra europeiska marknað.

Tørvurin á einum føroyskum umboðsmanni í Bruxelles er tí eyðsýndur á sama hátt, sum vit í dag hava eina viðskiftastovu og umboðsmann í Aberdeen og Keypmannahavn.

Vinnulívið hevur fyrr víst á henda tørv, og tíðindini nú um minstapris á laksi í EF og møguleikin fyri revsitolli upp á 20-22%, sum kann verða lagdur á norskan og føroyskan laks, tí at EF ákærir norðmenn fyri dumping, hava enn einaferð víst á tað neyðuga í eini umboðsstovu, sum kann taka sær av upplýsingarvirkseminum og gera arbeiði á staðnum fyri føroyskan útflutning.

Tí verður hetta uppskot sett fram.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 110/1991: Stovnsetan av føroyskari viðskiftastovu og setan av føroyskum umboðsmanni í Bruxelles.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnu flokki tann 19. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Birgir Danielsen, Sverre Midjord, Heini Johansen og Edmund Joensen) ásannar, at tað er meiri neyðugt enna nakrantíð at fylgja væl við, hvat fyriferst í høvuðsborgini í EF, og eisini at føroyskir myndugleikar og fyritøkur hava sakkøna hjálp har, sum hevur áhuga og kennir ábyrgd fyri føroyskum viðurskiftum við EF. Tó heldur nevndin, at tað ikki er vist, at tað er best við einari burtur av føroyskari umboðsstovu í Bruxelles, men at tað kanska er eins gott ella betri at samarbeiða við t.d. donsku umboðsstovuna har, sum vit hava heimild til samhært heimastýrislógina. Tað er vanligt, at lond samarbeiða við t. d. donsku umboðsstovuna har, sum vit hava heimild til sambært heimastýrislógina. Tað er vanligt, at lond samarbeiða um umboðan, har ikki verður mett at vera brúk fyri umboðsstovu burturav fyri eitt einstakt land. Fyri okkum, sum eru fáment, vil tað vera náttúrligt at samarbeiða við tey lond, sum vit hava mest samskifti við.

Út frá hesum setir meirilutin í staðin fyri uppskot Kristiliga Fólkafloksins, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokks fram nýtt

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at virka fyri, at føroyingar so skjótt sum gjørligt fáa stovn ella stovu í Bruxelles, sum kann taka sær væl av teimum viðurskiftum, sum Føroyar hava at greiða har, nú samskifti við EF heilt greitt verður meira enn frammanundan við høvuðsborgina í Bruxelles.

Ein minniluti (Hergeir Nielsen og Tordur J. Niclasen) tekur ikki undir við meirilutanum, tí at í orðing meirilutans liggur ein miðvís ætlan um, at føroyska umboðsstovan gerst ein partur av einari EF - stovu. Meirilutin mælir til, at føroyska umboðsstovan skal vera ein partur av teirri donsku.

Mælt verður tí til at taka undir við uppskotsstillarantum úr Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki við denti løgdum á, at talan er um eina av EF- ffggjarliga og politiskt óhefta umboðsstovu.

111. Uppskot til samtyktar um Eysturskúlan

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á Føroya Landsstýri at sleppa ætlanini um at keypa ella leiga allan Eysturskúlan ella partar av Eysturskúlanum frá Tórshavnar Býráði til maskinskúla.

Viðmerkingar:

Í samband við tann ótryggleika, ið nú í alt ov langa tíð hevur valdað um Eysturskúlan, fari eg at leggja fram uppskot um, at landsstýrið sleppur ætlanini um at keypa Eysturskúlan frá Tórshavnar Býráð til maskinskúla. Mælt verður til, at landsstýrið saman við kommununum heldur fram at arbeiða við eini heildarætlan fyri skúlaverkið bæði fólkaskúlanum, ástøðisútbúgvinunum og teimum hægru útbúgvinunum, soleiðis sum tað er fráboðað í løgtinginum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 111/1991: Uppskot til samtyktar um Eysturskúlan.

Málið varð lagt fram av Helenu Dam á Neystabø tann 10. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1992 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Eysturskúlamálið er áður viðgjørt av løgtingsins skúlanevnd í sambandi við skriv, ið kom til tingið, og hevur nevndin einmælt tikið støðu til hetta mál og setir sostatt einki uppskot fram.

112. Løgtingslóg um endurgjald til garnaskip

Uppskot

til

Løgtingslóg um endurgjald til garnaskip.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at rinda endurgjald til garnaskip, sum vegna friðingartiltøk í 1992 hava havt munandi inntøkumiss í garnaveiðuni. Endurgjaldið verður útgoldið av felagsjáttanini til fiskivinnuna í 1992.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om erstatning til garnskibe.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at udbetale erstatning til garnskibe, som på grund af fredningstiltag i 1992 har haft betydelig indtægtstab i garnfiskeriet. Erstatningen udbetales af fællesbevillingen til fiskerierhvervet i 1992.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Reiðarfini hjá Morning Star, Grunningi, Hoyvíkingi og Strandingi hava vent sær til landsstýrið í sambandi við kunngerð landsstýrisins nr. 3 frá 14. januar 1992, um broytingar í kunngerð um fiskiskapin á landleiðini, sum í veruleikanum setir totalbann fyri allari garnaveiðu undir Føroyum.

Reiðarfini vísa á, at tað eru 4 skip, sum royna við gørnum undir Føroyum, sum vanliga veiða norðanfyri í 2 mánaðir. Hesa veiðu hava skipini roynt á hvørjum ári, summi av hesum seinastu 20-25 árini.

Reiðarfini vísa somuleiðis á, at garnaveiðan hevur seinastu mongu árini verið eitt gott og neyðugt ískoyti hjá skipunum fyri at fáa raksturin at bera seg.

Ætlanin hevur verið at hildið áfram við hesari veiðu í 1992, og høvdu skipini riggað seg til, og vóru klár við manning at fara avstað, tá tiltøkini í kunngerð landsstýrisins vórðu sett í verk.

Havandi hesi viðurskifti í huga vísa reiðarfini á, at landsstýrið hevur skyldu at rinda endurgjald fyri tann fíggjarliga miss, skipini hava havt í sambandi við hesa brádligu avgerð um totalfriðing fyri allari garnaveiðu.

Fíggjarliga tapið er býtt upp í tríggjar partar:

1. Beinleiðis útreiðslur í samband við tilrigging í 1992 og fiskireiðskapur keyptur til hesa veiðu í 1992.
2. Mistar fløgur í útgerð til garnaveiðu, sum í dag ikki kann nýtast til annað endamál.
3. Mist veiðuinntøka.

Víst verður á, at lættast er at gera upp tann beinleiðis kostnað, skipini hava havt í sambandi við tilrigging til fiskiskapin í ár, meðan tað er meira trupult at gera fíggjarliga tapið upp í sambandi við mista veiðuinntøku, sjálvt um útvið 1/3 av samlaðu inntøkunum hjá hesum skipum seinastu árini stavar frá garnafiskiskapi.

Reiðaríini hava gjørt upp fíggjarliga tapið til 300.000 kr. fyri hvørt skip.

Viðmerkt verður, at einki er kravt fyri mista veiðuinntøku, men umfatar upphæddin bert tær undir pkt. 1 nevndu útreiðslur.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 112/1991: Løgtingslóg um endurgjald til garnaskip

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars og eftir 1. viðgerð tann 19. mars 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A.Johannesssen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) ásannar, at avgerðin um at seta bann fyri allari garnaveiðu varð tikin við stuttari freist, og høvdu garnaskipini gjørt seg út til hesa veiðu í ár. Tí heldur meirilutin tað verða rímiligt, at hesi skip fáa eitt ávíst endurgjald. Í uppskotinum frá landsstýrinum verður sagt at garnaskip, sum vegna friðingartiltøk í 1992 hava havt munandi inntøkumiss í garnaveiðuni, kunnu fáa endurgjald. Meirilutin heldur, at rættari er at siga, at garnaskip, sum hava havt munandi tap av gjørdum fløgum í garnaveiðu, fáa endurgjald, og mælir meirilutin tí til, at orðingin í § 1 verður broytt samsvarandi hesum. Meirilutin tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verða orðini "inntøkumiss í garnaveiðuni" broytt til "tap av gjørdum fløgum í garnaveiðu".	I § 1 ændres ordene "indtægtstab i garnfiskeriet" til "tab af foretagne investeringer i garnfiskeri".

Ein minniluti (Jógvan Ingvard Olsen) vísir á, at tá gjørdar verða umfatandi friðingar fyri einum veiðihátti, í hesum føri garnaveiðu, eigur hetta at verða gjørt við minst eitt árs fráboðan, so sleppast kann undan endurgjaldskravi. Minnilutin tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen) tekur í prinsippinum ikki undir við at lata endurgjald fyri fíggjarligar avleiðingar, ið standast av friðing; tekur annars støðu í tingsalinum.

Ein triðji minniluti (Niels Pauli Danielsen) tekur ikki undir við málinum um at veita endurgjald til ein ávísan veiðihátt, tí tað eru eisini aðrir, ið hava inntøkumiss og tap av ásettu friðingartiltøkunum í 1992, eitt nú snellu- og línumenn. Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) setir einki uppskot fram.

113. Broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á ytru landleiðini

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á ytru landleiðini.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om fiskeri på det ydre fiskeriterritorium.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, stk. 2 verður broytt soleiðis:
"Landsstýrinum er saman við fiskivinnunevnd løgtingsins heimilað við kunngerð at áseta serligar reglur um vernd av ungfiski. Heimilað verður landsstýrinum við kunngerð at áseta heitið ungfiskur og hámark fyri fblanding av ungfiski.

§ 1.

I lagtingslov nr. 8 af 29. marts 1978 om fiskeri på det ydre fiskeriterritorium med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 4. stk. 2 affattes således:
"Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets fiskeriudvalg ved bekendtgørelse at fastsætte regler til beskyttelse af ungfisk. Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte begrebet ungfisk og højest tilladte iblanding af ungfisk.

Vaktar- og bjargingartænastuni verður heimilað at áseta bráðfeingis bann fyri ávísar veiðihættir á ávísum fiskileiðum á ytru landleiðini, har íblandingin av ungfiski er meira enn hánarkið ásett. Bráðfeingis veiðisteðgur kann ásetast at galda upp til 7 samdøgur hvørja ferð.

Vaktar og bjargingartænastuni verður somuleiðis heimilað at loyva einstøkum fiskiføruni at gera royndir á bráðfeingis stongdari leið til tess at staðfesta, um bráfeingis veiðibann skal verða ásett av nýggjum. Bráðfeingis veiðibann skal lýsast í Útvarpi Føroya."

2) § 5, stk. 3 verður broytt soleiðis:

"Brot á reglurnar ásettar eftir § 4 koma undir bót. Haraftrat kann hald verða lagt á fiskireiðskapin, so sum net, lemmar, wirar, línur, uppstandarar v. m. og á fongin. Skipið kann eisini heftast til rindingar av bót og kostnað."

3) Sum nýtt stk. 4 í § 5 verður sett:

"Landsstýrið kann taka aftur veiðiloyvið fyri ávíst tíðarskeið ella fyribils, um skiparin á skipinum er dømdur ella hevur góðtikið bót fyri brot á hesa lóg ella reglur ásettar við heimild í lógini."

4) Sum nýtt stk. 5 í § 5 verður sett:

"Landsstýrið kann beinanvegin taka aftur veiðiloyvið, um fiskiveiðieftirlitið hevur staðfest brot á reglurnar um vernd av ungfiski

Vaktar- og bjargingartænastan bemyndiges til at fastsætte midlertidigt forbud mod bestemte fangstmetoder på bestemte fiskepladser på det ydre fiskeriterritorium, hvor iblandingen af ungfisk er mere end det højest tilladte. Midlertidigt fangstforbud kan fastsættes at gælde op til 7 døgn ad gangen.

Vaktar- og bjargingartænastan bemyndiges ligeledes til at give enkelte fiskefartøjer tilladelse til forsøg på midlertidigt lukket område for at konstatere, hvorvidt midlertidigt fangstforbud skal fastsættes på ny. Midlertidigt fangstforbud skal offentliggøres i Útvarp Føroya."

2) § 5, stk. 3 affattes således:

"Overtrædelse af bestemmelserne fastsat i henhold til § 4 straffes med bøde. Desuden kan samtlige fiskeredskaber, herunder net, skovle, wire, liner, opstandere m. v. og fangst konfiskeres. Skibet kan også beslaglægges til dækning af bøde og omkostninger."

3) Som nyt stk. 4 i § 5 indsættes:

"Landsstyret kan indrage fisketilladelsen på tid eller indtil videre, såfremt føreren af skibet er dømt eller har vedtaget bøde for overtrædelse af denne lov eller bestemmelser udfærdiget i medfør af loven."

4) Som nyt stk. 5 i § 5 indsættes:

"Landsstyret kan straks inddrage fiskeritilladelsen, såfremt fiskeriinspektionen har konstateret overtrædelse af bestemmelserne om

ásettar sambært § 4. Loyvið kann verða tikið ávist tíðarskeið ella fyribils."

5) Sum nýtt stk. 6 í § 5 verður sett:

"Veiðiloyvishavarin kann krevja, at avgerðin eftir stk. 5 skal verða løgd fyri dómsvaldið. Avgerðin skal innihalda upplýsing um rættin til at leggja avgerðina fyri dómsvaldið og kærufreist. Áheitan skal fráboðast landfútanum í seinasta lagi 1 viku eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi.

Málið verður lagt fyri dómsvaldið eftir reglunum í revsilógini § 78, stk. 3. Áheitanin virkar ikki steðgandi."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

beskyttelse af ungfisk fastsat i henhold til § 4. Inddragelsen kan ske på tid eller indtil videre."

5) Som nyt stk. 6 i § 5 indsættes:

"Afgørelsen efter stk. 5 kan af indehaveren af fiskeritilladelsen kræves indbragt for domstolene. Afgørelsen skal indeholde oplysning om adgangen hertil og om fristen herfor. Begæringen skal fremsættes over for landfogeden inden 1 uge efter, at afgørelsen er meddelt den pågældende.

Indbringelse for domstolene sker efter reglerne i staffelovens § 78, stk. 3.

Begæringen har ikke opsættende virkning."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið samtykti á fundi hin 27. februar 1992, at ungfiskakunngerðin verður herd og at landsstýrið útvegar sær heimild til umsitingarliga at sekta brot, eitt nú við at leggja skip, ið hava framt brot, í ávíst dagatal.

Reglurnar í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978, § 5, stk. 3, eru soleiðis, at brot á kunngerðir landsstýrisins, herundir brot á reglurnar um vernd av ungfiski, koma undir bót. Haraftrat kann veiðuloyvi verða tikið aftur, um skiparin er dømdur fyri brot móti reglunum.

Broytingin í § 4, stk. 2 heimilar Vaktar- og Bjargingartænastuni at áseta veiðibann, har ov nógv íblanding av ungfiski er til staðar í meira enn 7 dagar og at skipa fyri kanning á stongdari leið, áðrenn økir verða latin upp aftur.

Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta heitið ungfiskur og um hámark fyri íblanding av ungfiski. Kunngerðin verður ásett eftir uppskoti frá Fiskirannsóknarstovuni.

Broytingin eftir § 5, stk. 4-6 er nýggj og fevnir um reglur fyri, á hvønn hátt veiðiloyvið kann verða tikið aftur. Reglurnar heimila landsstýrinum at taka veiðiloyvið aftur fyri ávíst tíðarskeið, tá brot er framt á reglurnar um vernd av ungfiski.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 113/1991: Broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á ytru landleiðini.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1992 og eftir t. viðgerð tann 19. mars 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við fútan, sum upplýsti nevndini, at við verandi lógum og kunngerðum eru ikki møguleikar at reisa ákæru fyri brot á reglurnar um vernd av ungfiski. Fútin segði, at í fyriliggjandi uppskoti frá landsstýrinum verða heimildirnar í lagi, og at landsstýrinum í kunngerð verður heimilað at áseta heitið ungfiskur og um hámark fyri íblanding. Fútin upplýsti eisini, at við fyriliggjandi uppskoti er rættartrygdin í lagi.

Nevndin vísir á, at reglurnar um at taka veiðiloyvi frá skipum, eiga at verða heilt greiðar og ásettar í kunngerð, sum skal góðkennast av fiskivinnunevndini, og eiga at verða lagdar undir Vaktar- og bjargingartænastuna at umsita. Nevndin heldur ikki, at landsstýrið skal kunna taka veiðiloyvi fyribils. Eisini mælir nevndin til, at lógin ikki fær gildi, fyrrenn kunngerðirnar við heimildi í hesi lóg eru lýstar. Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við omanfyrinevndu broytingum og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

1. § 1, pkt. 1 verður soljóðandi: "§ 4. stk. 2 verður broytt soleiðis:

"Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at ásta serligar reglur um vernd av ungfiski og at áseta heitið ungfiskur og hámark fyri íblanding av ungfiski. Vaktar- og bjargingartænastuni verður heimilað at áseta bráðfeingis bann fyri ávísar veiðihættir á ávísum fiskileiðum á ytru landleiðini, har íblandingin av ungfiski er meira enn hámarkið ásetur. Bráðfeingis veiði-

1. § 1, pkt. 1 formuleres således: "§ 4, stk. 2 affattes således:

"Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte regler til beskyttelse af ungfisk og at fastsætte begrebet ungfisk og højest tilladte iblanding af ungfisk. Vaktar- og bjargingartænastan bemyndiges til at fastsætte midlertidigt forbud mod bestemte fangstmetoder på bestemte fiskepladser på det ydre fiskeriterritorium, hvor iblandingen af ungfisk er mere end det

steðgur kann ásetast at galda upp til 7 samdøgur byrja ferð. Vaktar- og bjargingartænastuni verður somuleiðis heimilað at loyva einstøkum fiskiførum at gera royndir á bráðfeingis stongdari leið til tess at staðfesta, um bráfeingis veiðibann skal verða ásett av nýggjum. Bráfeingis veiðibann skal lýsast í Útvarpi Føroya.""

2. Í pkt. 3 verður aftan á orðini "Landsstýrið kann" innsett "smb. kunngerð" og orðini "ella fyribils" verða strikað.

3. Í pkt. 4 verður aftan á orðini: "Landsstýrið kann" innsett "smb. kunngerð" og orðini "ella fyribils" verða strikað.

4. § 2, stk. 1 verður soljóðandi:

"Kunngerðirnar við heimild í hesi lóg verða at leggja fyri fiskivinnunevnd løgtingsins til góðkenningar, og lógin fær gildi, tá ið kunngerðirnar eru lýstar."

høj est tilladte. Midlertidigt fangstforbud kan fastsættes at gælde op til 7 døgn hver gang. Vaktar- og bjargingartænastan bemyndiges ligeledes til at give enkelte fiskefartøjer tilladelse til forsøg på midtertidigt lukket område for at konstatere, hvorvidt midlertidigt fangstforbud skal fastsætte på ny. Midlertidigt fangstforbud skal offentliggøres i Útvarp Føroya.""

2. I pkt. 3 indsættes efter efter ordene: "landsstyret kan" "iflg. bekendtgørelse" og ordene "eller indtil videre" udgår.

3. I pkt. 4 indsættes efter ordene: "Landsstyret kan" "iflg. bekendtgørelse" og ordene "eller indtil videre" udgår.

4. § 2, stk. 1 formuleres således:

"Bekendtgørelserne med bemyndigelse i denne lov forelægges lagtingets fiskeriudvalg til godkendelse, og loven træder i kraft efter bekendtgørelsene er bekendtgjorde."

114. Altjóða reguleringstiltøk viðvíkjandi fiskiskapi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at ríkislóg nr. 210 frá 19. mai 1971 um altjóða reguleringstiltøk viðvíkjandi fiskiskapi verður sett úr gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 55 frá 22. september 1978 er landsstýrinum heimilað at gera avtalur við fremmand lond um fiskiveiðuavtalur um fiskiskap í heimasjógvi teirra ella á viðum havi við fiskiskipum, sum hava heimstað og eru skrásett í Føroyum. Heimildin hjá landsstýrinum er treytað av góðkenning frá løgtinginum, tó kann Marknaðarnevnd Løgtingsins geva fyribils góðkenning. Lógin heimilar landsstýrinum saman við Løgtingsins Marknaðarnevnd við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapurin skal fara fram, herundir reguleringstiltøk, sum eisini eru í donsku reglunum.

Ríkislóg nr. 210 frá 19. mai 1971 er ein ramnulóg, sum samsvarar løgtingslóg nr. 55 frá 22. september 1978. Reglurnar í donsku lógini hava verið nýttar frammanundan broytingunum í 1978, tá løgtingið samtykti nýggjar lógir um fiskivinnu fyri føroysk skip sambært løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978, løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fremmand fiskifør og løgtingslóg nr. 55 frá 22. september 1978 um reguleringstiltøk.

Við heimild í ríkislógini eru settar í gildi fyri Føroyar hesar kunngerðir:

a. "Bekendtgørelse nr. 118 af 12. marts 1974 om regulering af fiskeriet i det nordvestlige Atlanterhav",

b. "Bekendtgørelse nr. 250 af 14. juni 1972 om regulering af laksefiskeriet i det nordvestlige Atlanterhav, som ændret med bekendtgørelse nr. 326 af 24. juni 1974",

c. "Bekendtgørelse nr. 237 af 11. maj 1976 om ændring af bekendtgørelse om regulering af fiskeriet i det nordvestlige Atlanterhav",

d. "Bekendtgørelse nr. 283 af 7. juni 1974 om laksefiskeri på det grønlandske fiskeriterritorium",

e. "Bekendtgørelse nr. 251 af 20. maj 1974 om regulering af fiskeriet ved Færøerne",

f. "Bekendtgørelse nr. 112 af 16. marts 1976 for Færøerne om regulering af visse fiskerier i det nordøstlige Atlanterhav som ændret ved bekendtgørelse nr. 576 af 1. december 1976 og bekendtgørelse nr. 140 af 16. marts 1977 om ændring af bekendtgørelse for Færøerne om regulering af visse fiskerier i det nordøstlige Atlanterhav",

g. "Bekendtgørelse nr. 271 af 25. maj 1976 for Færøerne om regulering af fiskeriet i det nordøstlige Atlanterhav som ændret ved bekendtgørelse nr. 139 af 16. marts 1977 og bekendtgørelse nr. 538 af 26. oktober 1977 om ændring af bekendtgørelse for Færøerne om regulering af fiskeriet i det nordøstlige Atlanterhav".

Allar hesar reglur eiga samstundis at fara úr gildi, tá reglurnar í løgtingslóg nr. 55 frá 22. september 1978 við seinni kunngerðum avloysa donsku reglurnar.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 114/1991: Altjóða reguleringstiltøk.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 19. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur eisini havt fund við John Petersen, landsstýrismann. Hann varð spurdur, hvørt landsstýrið skuldi lýsa nýggjar kunngerðir við heimild í løgtingslógum frá 1978 um fiskifør, sum svara til tær kunngerðir, sum fara úr gildi, um løgtingið samtykkir at seta ríkislóg nr. 210 frá 19. mai 1971 úr gildi fyri Føroyar. John Petersen svaraði, at ásetingarnar eftir løgtingslóg nr. 55 frá 22. september 1978 við seinni kunngerðum avloysa donsku reglurnar.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

115. Avtøka av og endurgjald fyri goldnan toll og goldin avgjøld í samband við fiskaaling

Uppskot

til

samtyktar

I Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at gera reglur fyri avtøku av tolli og avgjøldum á útgerð og tilfari til alivinnuna.

II. Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at gera reglur fyri endurgjald av tí, sum alivinnan hevur goldið í tolli og avgjøldum.

Viðmerkingar:

5. hvør útflutningskróna hjá Føroyum kemur frá alivinnuni. Í fjør (1991) vórðu 15.000 tons av alifiski útflutt fyri slakar 550 mió., sum er tað higartil mesta. Forsøgnin hevði roknað við 14.000 tonsum.

Fyri 1992 er roknað við, at samlaða tonsatalið til útflutnings kemur upp á 18 - 20.000 tons.

Til at framleiða hesi 20.000 tonsini er roknað við 2000 arbeiðsplássum. 10 - 15 tons verða mett at geva 1 arbeiðspláss.

Alivinnan fær sum er ongan studning, men rindar tvørturímóti væl av peningi í tolli og avgjøldum, sum aðrar útflutningsvinnur sleppa undan.

Eitt alibrúk, sum t.d. hevur framleitt 1300 tons í 4 ár (góð 300 tons um árið), hevur goldið tí almenna nærum 2 mió. kr. tá ið vinningurin til apotekið fyri medisin v. m. uppá 700.000 kr. er tikin við. Í tolli og avgjøldum er tá goldið 1,3 mió. kr.

O. u. 50 alibrúk eru í Føroyum í dag, og tey flestu teirra hava stórar tropulleikar at drugast við og orka ikki at rinda tí almenna henda toll og hesi avgjøld.

Samlaða lánibyrðan hjá alivinnuni er 1,2 mia. kr., soleiðis at helvtin av lánunum hjá alivinnuni eru tikin fyri at rinda gjøldini til landskassan, sum við vinninginum til apotekið er 600 mió. kr.

Nú orkar alivinnan ikki meir at gjalda landskassanum hesa stóru upphædd, meðan aðrar vinnugreinir ikki bara sleppa undan, men eisini fáa beinleiðis studning úr landskassanum.

Í londunum, vit kappast við, bæði EF og Noreg, fær alivinnan dyggan stuðul, bæði hvat viðvíkur fløgum, rakstri, marknaðarføring og tænastuvinnu sum djóralæknatænastu og gransking, har alivinnan í Føroyum sjálv má gjalda.

Arbeiðsloysið bara veksur og hevur ongantíð verið goldið meira út enn fyri februar í forsorgarhjálp til arbeiðsleys. Vit mugu steðga hesi gongd fyrst við at tryggja okkum tey arbeiðspláss, ið eru t. d. í alivinnuni, og síðan fara undir at útvega okkum nýggj arbeiðspláss.

Átit

í

Løgtingsmáli nr. 115/1991: Avtøka av og endurgjald fyri goldnan toll og goldin avgjøld í samband við fiskaaling.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 10. mars 1992 og undir 1. viðgerð 18. mars 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Videro) heldur tað verða umsitingarliga tupult at skula endurgjalda goldnan toll og goldin avgjøld til alivinnuna. Meirilutin ásannar eisini, at gjaldførið hjá landskassanum er vánaligt og neyvan tolir at endurgjalda toll og avgjøld fleiri ár aftur í tíðina.

Eisini vísir meiriltin á, at meirvirðisgjaldsskipanin eftir ætlan kemur í gildi 1. januar 1993, og at hetta førir við sær, at innflutningsgjaldið verður avloyst av einum meirvirðisgjaldi, ið útflutningsvinnan fer at fáa endurgoldið, tá framleiðslan verður útflutt.

Annars hevur nevndin hildið fund við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í liggjarmálum, sum upplýsti fyri nevndini, at landsstýrið arbeiðir við spurninginum um vinningin, apoteksverkjð tekur við sølu av heilivági til alivinnuna.

Út frá hesum setir meirilutin einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Lasse Klein) mælir í fyrstu syftu til at samtykkja punkt 1 í uppskoti Kristiliga Fólkafloksins og tekur í aðru syftu undir við viðmerkingunum hjá meirilutanum.

116. Broytingar í ferðslulógini

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu við seinri broytingum verður í § 16 stk. 3 "0,8 promillu" broytt til "0,2 promillu".

§ 2.

Lógin verður sett í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om færdsel.

§ 1.

I lagtingslov nr. 65 af 9. september 1963 om færdsel med senere ændringer bliver i § 16 stk. 3 "0,8 promille" ændret til "0.2 promille".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Nógv hevur verið tosað um vandarnar, ið standast av rúsdrekkakoyring, og kemur hesin vandi uttan iva í størri mun at geva seg til kennar, tá nýggja rúsdrekkalógin verður sett í gildi.

Lond rundan um okkum - undantikið Danmark - hava tikið álvaran av rúsdrekkakoyring til eftirtektar og nýta promillumark, ið eru munandi lægri enn galdandi er her á landi.

Promillumarkið í Danmark er 0,8, Íslandi 0,5, Noreg 0,5, Finnlandi 0,5 og Svøriki 0,2.

Her á landi er nú tíðin komin at lækkað promillumarkið, og verður hetta gjørt til tess at undirstrika týdningin av promillufrírari koyring, sum partur av ábyrgdarfullum ferðslupolitikki og nýtsluminkandi rúsdrekkapolitikki, soleiðis sum uppskotsstillarin í álitinum til nýggja rúsdrekkalóg vísti á.

Verður uppskotið samtykt vil tað minka um avleiðingarnar, ið annars standast av "promillukoyring".

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 116/1991, Broytingar í ferðslulógini.

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1992 beint til viðgerðar í rættarnevndini.

Málið snýr seg um uppskot til løgtingslóg um broyting í ferðslulógini. Við broytingini verður mælt til, at núgaldandi promillumark verður broytt frá 0,8 o/oo til 0,2 o/oo.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Maritu Petersen, landsstýriskonu, Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra, landfútan og varafútan.

Undir viðgerðini er tað vorðið upplýst, at landsstýrið arbeiðir við broytingum í ferðslulógini, nevndin heldur tí ikki tað vera ráðiligt at gera hesa broyting nú uttan samanhang við tey broytingaruppskot, ið koma frá landsstýrinum. Hetta serliga tí, at ein tílík broyting, sum mælt verður til í uppskotinum, eisini krevur broytingar í revsireglunum í ferðslulógini. Út frá hesum mælir nevndin til at senda landsstýrinum málið, men setir annars einki uppskot fram.

117. Uppskot til løgtingslóg um studning til bygging o.a. av bygdar- og býarhúsum

Uppskot

til

Løgtingslóg um studning til bygging o. a. av bygdar- og býarhúsum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at veita 30% í studningi til bygging og um- og útbygging av bygdar- og býarhúsum og til keyp og innrætting av húsum til endamálið.

Stk. 2. Studningurin verður bert veittur til 1 hús í hvørjari bygd ávíkavist hvørjum býi, í Tórshavn tó til 1 hús fyri hvørjar 4.000 íbúgvar.

Stk. 3. Studningurin er treytaður av, at hin parturin av kostnaðinum er fingin til vega á annan hátt.

Lagtingslov om tilskud til opførelse m. m. af bygde- og byhuse.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at yde 30% i tilskud til opførelse og om- og udbygning af bygde- og byhuse og til køb og indretning af huse til formålet.

Stk. 2. Tilskuddet ydes kun til 1 hus i hver bygd henholdsvis hver by, i Tórshavn dog til 1 hus for hver 4.000 indbyggere.

Stk. 3. Tilskuddet er betinget af, at den øvrige del af omkostningerne er tilvejebragt på anden måde.

§ 2.

Bygdar- og býarhús eru hús, sum verða brúkt av øllum aldursbólkum at savnast í til ymisk tiltøk í frítíðini.

§ 3.

Á fíggjarløgtingslógini verður á hvørjum ári játtaður peningur til bygging o.a. av bygdar- og býarhúsum.

§ 4.

Landsstýrið ásetir nærri reglur um studning til bygging o. a. av bygdar- og býarhúsum.

§ 5.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 50 frá 24. mai 1974 um studning til bygging av ungdómshúsum.

§ 2.

Bygde- og byhuse er huse, som benyttes af alle aldersklasser til at samles i til forskellige arrangementer i fritiden.

§ 3.

På finanslagtingsloven bevilges hvert år penge til opførelse m. m. af bygde- og byhuse.

§ 4.

Landsstyret fastsætter nærmere regler om tilskud til opførelse m.m. af bygde- og byhuse.

§ 5.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 50 af 24. maj 1974 om tilskud til opførelse af ungdomshuse.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 50 frá 24. mai 1974 um studning til bygging av ungdómshúsum § 1 verða úr landskassanum veitt upp til 40% í studningi til bygging av ungdómshúsum í Føroyum, treytað av at hin parturin av byggikostnaðinum er fingin til vega á annan hátt.

Av viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 103/1973: Studningur til ungdómshús sæst, at ætlanin við løgtingslógini var at elva ungdóminum til at fara undir at byggja ungdómshús, har hann kundi savnast til fundir, sjónleik, fyrilestrar og annað gagnligt ítriv.

Umframt at nýta heimildina at veita studning í nevndu løgtingslóg nr. 50/1974 hevur landsstýrið eftir fyrisitingarvenju eisini veitt studning til bygdarhús, har ikki bert ungdómur, men allir aldursbólkar kunnu savnast til ymisk tiltøk.

Eftir hesi fyrisitingarvenju hevur landsstýrið, umframt studning til bygging, eisini veitt studning til um- og útbygging av ungdóms- og bygdarhúsum og til keyp og innretting av húsum til endamálið, men ikki til vanligt viðlíkahald.

Studningurin hevur í flest øllum førum verið 30% av kostnaðinum.

Eftir umrøddu fyrisitingarvenju hevur landsstýrið sum ungdómshús - umframt tey húsini, sum verða nevnd ungdómshús ella tílíkt - eisini roknað onnur hús, har ungdómurin savnast til ymisk tiltøk í frítíðini, tó so at studningur til slík hús, sum

bert lutvíst verða brúkt av ungdóminum, bert verður roknaður av kostnaðinum av tí partinum av húsinum, sum ungdómurin brúkar, ella - um ungdómurin ikki brúkar ein part av húsinum burturav - av tí partinum av samlaða kostnaðinum, sum svarar til virksemið hjá ungdóminum í mun til samlaða virksemið í húsinum.

Á henda hátt er tað komið fyri, at studningur er veittur til fleiri hús í somu bygd ella sama býi, og nú er eisini dømi um, at ein býlingur í Tórshavn søkir um studning til ungdóms- og bygdarhús.

Tann peningur, sum higartil er játtaður á fíggjarløgtingslógini til grunnin til ungdóms- og bygdarhús, hevur ikki rokkið til tær umsóknir, sum landsstýrið hevur til viðgerðar. Í hesum sambandi kann verða víst á, at samb. § 1 í uppskoti til løgtingslóg um avtøku av landskassagrunnunum verður ungdóms- og bygdarhúsgrunnurin avtikin. Í staðin er byggirakstrarstað á fíggjarløgtingslógini til endamálið: Studningur til bygdarhús, nýbygging.

Samstundis verður víst á, at um fyrr umrøddu fyrisitingarsiðvenja skal halda fram og talið av umsóknum verður tað sama, má roknast við, at meiri peningur má játtast til hetta endamál enn í dag.

Landsstýrið heldur sostatt, at tíðin nú er komin at endurskoða løgtingslóg nr. 50/1974 út frá frammanfyri umrøddu fyrisitingarvenju og teimum royndum, ið eru gjørdar, síðan nevnda løgtingslóg fekk gildi.

Ætlan landsstýrisins er, at studningur til ungdóms- og bygdarhús, sum tilskilað í § 1 í uppskotinum, framyvir bert skal verða goldin til bygging og um- og útbygging av bygdar- og býarhúsum ella til keyp og innrætting av húsum til hetta endamálið og bert til 1 hús í hvørji bygd ávikavist hvørjum býi, í Tórshavn tó til 1 hús fyri hvørjar 4.000 íbúgvar, og herumframt at studningurin eins og higartil skal vera treytaður av, at hin parturin av kostnaðinum er fingin til vega á annan hátt.

Uppskotið fevnir sostatt bert um verulig bygdar- og býarhús, tað er sum tilskilað í § 2 hús, sum verða brúkt av øllum aldursbólkum at savnast í til ymisk tiltøk í frítíðini, t.d. fundir, fyrilestrar, sjónleik, tónleik, dans og veitslur, meðan hús, sum bert hava eitt avmarkað endamál og bert verða brúkt av bólkum í samfelagnum, ikki eru fevnd av uppskotinum.

Avvarðandi kommunur, har hús eru bygd ella keypt við studningi úr Ungdóms- og bygdarhúsgrunninum, hava landsstýrinum kunnugt í nógvum førum somuleiðis veitt 30% í studningi, og landsstýrið roknar við, at henda mannagongd eisini verður fylgd framyvir viðvíkjandi bygdar- og býarhúsum.

118. Almenn upplýsing um fíggjarstøðu landsins

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum regluliga at upplýsa alment umfíggjarstøðu og likviditet landsins.

Viðmerkingar:

Tey flestu hava varhugan av, at okkara fíggjarviðurskifti, bæði innanlands og mótvegis útlondum, eru alt annað enn góð.

Tá talan er um fíggjarviðurskifti í okkara samfelag í dag, er sera ringt hjá almenninginum at fáa eina fatan av støðuni sum heild.

Tá løgmaður úttalar seg um okkara peningaligu viðurskifti, er tað mest at líkna við tokutalu, vit berjast, vit miða ímóti, vit vænta o.s.fr.

Varaløgmaður er meira avgjørdur, tað stendur betri og betri til, vit vænta javnvág, botnurin er náddur, nú er bert ein vegur at ganga, og tað er tann rætti, alt meðan arbeiðsloysið setir met, alt meðan fleiri og fleiri noyðast tann tunga veg, at siga húsi og heimi farvæl.

Vit, sum sita úti í politiska kuldanum, verða fyri hvøm dag, ið gongur, alt meir og meir greið yvir, at fíggjarstøða landsins sum heild, ikki bert er álvarslig, men meiri at kalla katastrofal.

Tað er ikki nokk bara at júka um betraðan handils- og gjaldsjavna.

Vit halda tað tí vera upp á sítt plúss, at almenningurin regluliga verður kunnaður um okkara peningaligu viðurskifti, t.d. einaferð um mánaðin, eina kvartalsfráboðan ella eins og dagbløðini kunna almenningin um útlendska gjaldoyra.

Tí hetta uppskot til samtyktar.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 118/1991: Almenn upplýsing um fíggjarstøðu landsins.

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1992 beint í fíggjarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

119. Býtið av almannaútreiðslunum

Uppskot

til

Løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslunum.

§ 1.

Lógin fevnir í § 2 um útreiðslur av:

1) útgoldnari fólkapensión við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om folkepension",
2) útgoldnari avlamispensión og avlamisveiting við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om invalidepension m. v.",
3) útgoldnari einkjupensión við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
4) barnaforsorgarútreiðslur sambært § 43, stk. 2 og 3 í "Lov for Færøerne om børneforsorg",
5) útgoldnari hjálp til einstaklingar sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
6) heimahjálparaútreiðslur sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
7) útgoldnari veiting sambært "Lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.",
8) til rakstur av røktar-, ellis- og vistarheimum.
9) til rakstur av stovnum sambært § 32, stk. 2 í "Lov for Færøerne om offentlig forsorg".

Lagtingslov om fordelingen af de sociale udgifter.

§ 1.

Loven omfatter i § 2 udgifter af:

1) udbetalt folkepension samt tillæg jvf. "Lov for Færøerne om folkepension",
2) udbetalt invalidepension, invaliditetsydelse samt tillæg jvf. "Lov for Færøerne om invalidepension m. v.",
3) udbetalt enkepension samt tillæg jvf. "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
4) børneforsorgsudgifter jvf. § 43. stk. 2 og 3 i "Lov for Færøerne om børneforsorg",
5) udbetalt hjælp til enkeltpersoner jvf. "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
6) udgifter til hjemmehjælp jvf. "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
7) udbetalt ydelse jvf. "Lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.",
8) driftsudgifter vedrørende alderdoms og plejehjem og særlige plejehjem.
9) driftsudgifter vedrørende institutioner jvf. § 32, stk. 2 i "Lov for Færøerne om offentlig forsorg".

§ 2.

Av føroyska partinum av útreiðslunum sambært § 1 verða 90% goldin úr landskassanum og kommununar gjalda 10%.

Stk. 2. Landskassin leggur út kommunanna part, og fær hann afturgoldnan soleiðis, at seinast 1. apríl hvørt ár verður gjørt upp, hvussu nógv landskassin skal hava aftur frá hvørjari kommunu sær fyri farna fíggjarárið, við at 50% verða roknað eftir seinasta fólkatali og 50% eftir skattainntøkuni í kommununi seinasta ár. Kommununar rinda teirra part í seinasta lagi 1. september í árinum, sum uppgjørt er.

Stk. 3. Føroyski parturin av útreiðslunum sambært § 1 er bruttoútreiðslurnar frádrigið endurrindan frá danska ríkiskassanum.

§ 3.

Av rakstrarútreiðslunum til røktar- og ellisheim verða 15% goldin av teimum luttakandi kommununum sambært býtinum, sum er ásett í § 2, stk. 2.

§ 4.

Av húsaútreiðslum til dagstovnar fyri børn o.l. sambært § 43, stk. 1, 2. pkt. í barnaforsorgarlógini verða 40% goldin av viðkomandi kommunu/kommunum. Landskassin rindar 60%.

§ 5.

Útreiðslur sambært almannalóggávuni annars, ið skulu rindast "efter hjemmestyrets nærmere bestemmelse", verða rindaðar av landskassanum.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at

§ 2.

Af Færøernes andel af udgifterne jvf. § 1 udreder landskassen 90% og kommunerne 10%.

Stk. 2. Landskassen udlægger kommunernes andel og får den refunderet således, at senest 1. april hvert år udregnes, hvor meget landskassen skal have refunderet fra hver enkelt kommune for det forløbne finansår, derved at 50% pålignes efter sidste folketal og 50% efter sidste års skatteindtægt i kommunen. Kommunerne betaler deres andel senest 1. september i det år, opgørelsen foretages.

Stk. 3. Færøernes andel af udgifterne jvf. § 1 er bruttoudgifterne fradraget refusion fra den danske rigskasse.

§ 3.

For alderdoms- og plejehjem gælder dog, at de deltagende kommuner afholder 15% af driftsudgifterne, som fordeles mellem kommunerne jvf. bestemmelserne i § 2, stk. 2.

§ 4.

For daginstitutioner for børn o.l. jvf. § 43, stk. 1, 2. pkt. gælder dog, at vedkommende kommune/kommuner afholder 40% af ejendomsudgifterne. Landskassen afholder 60%.

§ 5.

Udgifter i medfør af den sociale lovgivning i øvrigt, som skal "afholdes efter hjemmestyrets nærmere bestemmelse", afholdes af landskassen.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter

hon er kunngjørd, og verður galdandi frá og við fíggjarárinum 1991.

Stk. 2. Samstundis fer løgtingslóg nr. 74 frá 24. oktober 1978 um býti av sosialu útreiðslunum úr gildi.

dens bekendtgørelse, og finder anvendelse fra og med finansåret 1991.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 74 fra 24. oktober 1978 om fordeling af sociale udgifter.

Viðmerkingar:

Rættarstøðan í dag viðvíkjandi býtinum av útreiðslunum innan almannaøkið millum landskassan og kommununrnar er løgtingslóg nr. 74 frá 24. oktober 1978. Hóast nógvar broytingar eru framdar innan almannaøkið síðani tá, er hendan lógin ongantíð endurskoðað.

Síðani 1978 hava vit fingið eina dagpeningalóg, sum er ein donsk lóg, ið hvat viðvíkur endurrindan úr danska ríkiskassanum er meinlík hinum høvuðslógunum innan almannaøkið. Lítsini eru gjørdar betringar í almannalóggávuni í skapi av løgtingslógum, t.d. løgtingslóg um ansingarsamsýning, løgtingslóg um brennistudning, umframt leinging av dagpeningatíðarskeiðnum. Hesar løgtingslógir áseta allar, at útreiðslurnar, ið standast av lógunum, verða rindaðar av landskassanum einsamøllum.

Størsta og tann mest grundleggjandi broytingin, ið so at siga tók grundarlagið undan galdandi løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum, var, tá blokkstuðulsskipan varð sett í verk frá 1. januar 1988.

Við blokkstuðulsskipanini vórðu veitingarreglurnar viðvíkjandi endurrindan frá danska ríkiskassanum broyttar m. a. soleiðis, at sjálvar pensiónsútreiðslurnar av fólka-, avlamis- og einkjupensiónum skuldu endurrindast við 50% sum áður, men á øllum øðrum økjum, t. d. dagpening, forsorgarlóg, barnaforsorgarlóg, veitingar annars sambært pensiónslógunum, varð endurrindanin frá danska ríkiskassanum broytt til 25%.

Grannskoðanardeild landskassans hevur síðani heitt á landsstýrið um at fáa lógina broytta, við tað at núgaldandi skipan er blivin ógjørlig at umsita eftir at blokkstuðulsskipanin er komin, og landsstýrið samstundis hevur boðað frá, at útrokningin av útreiðslubýtinum millum landskassan og kommununrnar skuldi fara fram á slíkan hátt, at kommununrnar hvørki skuldu verða betur ella verri fyri, enn áðrenn blokkstuðulsskipan varð sett í verk.

Fyriliggjandi uppskot er ein neyðug ajourføring av gomlu lógini, og hevur høvuðsdenturin verið lagdur á, at útreiðslustøðið hjá kommununum varð hildið á sama støði sum í dag.

Ætlanin er, at spurningurin viðvíkjandi útreiðslubýtinum millum landskassan og kommununrnar innan almannaøkið í samráð við kommununrnar nú skal takast upp til viðgerðar av nýggjum, og verður miðað ímóti at kunna leggja eitt uppskot fyri løgtingið hesum viðvíkjandi innan árslok.

Landsstýrið metir tó, at tað er bráðneyðugt beinanvegin at fáa nakrar greiðari reglur um býtið millum landskassan og kommununrnar. Galdandi siðvenja á hesum øki er orðin so torskild og fløkt, at einans fáar kommunur hava møguleika og umsiting til at finna útav, hvussu stóran part kommunan eigur og kann rokna við at skula gjalda til almannaútreiðslur.

Í lógaruppskotinum er partur kommununna settur í mun til, hvussu stóran part av tí føroyska partinum av samlaðu almannaútreiðslunum kommununrnar í dag rinda. Lógaruppskotið viðførir sostatt onga broyting fyri útreiðslustøðið hjá kommununum, sum verður á leið tað sama sum áður.

Sambært fyribilsrokniskapinum hjá Almannastovuni fyri 1991 var føroyski parturin av útreiðslunum sambært almannalógunum kr. 636.674.135,-. Kommununnar partur av hesum eftir galdandi skipan er umleið kr. 44.109.347,-. Sambært fyriliggjandi uppskoti verður kommununrnar partur av almannaútreiðslunum í 1991 umleið kr. 42.828.390,-, t.v.s. ein lækking av kommununna parti uppá kr. 1.280.957, ella 2,9%.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 119/1991: Býtið av almannaútreiðslunum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í almanna- og heilsunevndin.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við avvarðandi landsstýrismann og fulltrúa og umboð fyri Føroya Kommunufelag og Tórshavnar Býráð.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Sverre Midjord og Sonnner Winther) metir, at býtið av almannaútreiðslunum hevur verið fløkt, at nógvar av smáu kommununum ikki hava kunnað fylgt við, og eru tískil komnar illa fyri av cykarokningum. Við hesum uppskoti verða greiðari reglur um býtið millum landskassan og kommununrnar.

Ein onnur broyting er, at endaligi avrokningardagurin við hesum verður framskundaður frá 1. desember til 1. september í útrokningarárinum.

Lógaruppskotið viðførir onga broyting fyri útreiðslustøðinum hjá kommununum, sum verður á leið tað sama sum áður.

Boðað er frá, at útreiðslubýtið millum landskassan og kommununrnar innan almannaøkið í samráð við kommununrnar nú skal takast upp til viðgerðar av nýggjum. Hetta er við tí fyri eyga, at kommununrnar koma at gjalda part av teimum almannaútreiðslum, har kommununrnar hava ávvirkan og onga aðrastaðni. Landsstýrið ætlar at fáa uppskot hesum viðvíkjandi lagt fyri tingið innan árslok.

Frá Tórshavnar Býráð varð sagt, at býti av almannaútreiðslunum broyttist, tá blokkurin kom. Nevndin hevur reist spurningin fyri landsstýrinum. Landsstýrið hevur svarað nevndini, at eingin broyting fór fram, tá blokkurin kom, "sum um blokkurin ikki var komin" sum svarað er frá landsstýrinum.

Við hesum viðmerkingum mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen) hevur hesar viðmerkingar: Í viðmerkingum landsstýrisins til lógaruppskotið verður sagt, at eftir nýggju reglunum verða kommununar hvørki betur ella verri fyri, enn áðrenn blokkstuðulsskipanin varð sett í verk. Hinsini verður sagt, at partur kommununar verður settur í mun til, hvussu stóran part av tí føroyska partinum av samlaðu almannaútreiðslunum kommununar í dag rinda, og at lógaruppskotið sostatt onga broyting viðførir fyri útreiðslustøðið hjá kommununum.

Viðmerkjast skal, at landskassin hevur fingið helvtina av rakstrarútreiðslunum við blokkstuðulsskipanini, og sambært hjáløgdum tølum frá Almannastovuni verður kommunanna partur av útreiðslunum til ellis-, røktar- og vistarheim øktur frá umleið 4,5 mió. kr. til góðar 10 mió. kr. Eisini talið til heimahjálparaskipanina verður hækkað.

Spurningarnar viðvíkjandi "vanligari forsorg" ávirka ikki fíggjarstøðu kommununna í sama mun sum tær ávirka fíggjarstøðu landskassans. Tí vil fyriliggjandi uppskot gerast tung fíggjarlig byrða hjá teim kommunum, ið reka ellis-, røktar- ella vistarheim.

Málini áttu at verið viðgjørd meira gjølla av landsstýri og kommunum í felag, so greiða fekst á fleiri spurningum, sum talan er um, men frá landsstýrisins síðu verður sagt at málið hevur skund.

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen) kann ikki taka undir við meirilutanum í nevndini, tá kommunanna partur av útreiðslunum til ellis-, røktar- og vistarheim átti at verið 5% í staðin fyri 10% og til heimahjálparaskipanina 1/12 í staðin fyri 1/6, og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 2, stk. 1 verður skoytt uppí: "fyri ellis-, røktar- og vistarheim tó 95% úr landskassanum og kommunanna partur 5% og fyri heimahjálparaskipanina kommunanna partur 1/12."	I § 2, stk. 1 tilføjes: "for alderdoms- og plejehjem og særlige plejehjem dog 95% af landskassens midler og kommunernes andel 5% og for hjemmehjælpsordningen kommunernes andel 1/12."

Minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur støðu í tingsalinum.

120. Ígildissetan av ymsum ríkislógum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til at uppskot til:

1) "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser. (Indførelse af regler om ydelser med tilbagebetalingspligt til udgifter vedrørende ejerboliger)",
2) "Lov om ændring af lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel".

verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Á fundi í Tinganesi tann 6. juni 1991 í "Udvalget vedrørende sociallovgivningen på Færøerne" varð frá føroyskari síðu m.a. sett fram ynski um:

1) Broytingar í ávikavist forsorgarlógini, barnaforsorgarlógini, fólka- og avlamispensiónslógini, við atliti til at fáa eina greiða lógarheimild fyri at gera veitingar í samband við húsaútreiðslur afturgjaldsskyldugar, umframt at útgoldnu veitingarnar kunnu tinglýsast.
2) Broyting í kærureglunum í dagpengalógini.

Ad 1.

Grundin til ynsktu broytingarnar í hesum 4 lógunum er, at í Føroyum búgva fólk flest í egnum sethúsum, og at útboðið av leiguíbúðum er ógvuliga avmarkað. Hetta ger, at Almannastovan í nógv størri mun enn í Danmark t.d. játtar stuðul til ofta ógvuliga umfatandi og kostnaðarmiklar umbyggingar av sethúsum umframt ymisk hjálpitól til brekaði fólk og foreldur, ið hava brekaði børn.

Tað sama ger seg galdandi, tá fólk gerast eldri og vegna heilsubrek e. a. ikki longur klára seg so væl í sínum húsum, ið ofta eru innrættað soleiðis, at tey ikki eru bóskandi til tørvin hjá eldri fólkum (fólkapensiónistum). Eisini í hesum førum játtar Almannastovan stuðul til neyðugar broytingar av heiminum, soleiðis at pensiónisturin kann verða búgvandi heima sum longst.

Íbúðarmynstrið í Føroyum við, at fólk flest ofta búgva í dýrum sethúsum, sum tey sjálvi eiga, ger eisini, at Almannastovan játtar ógvuliga týðandi upphæddir í

samband við skuldarsanering, í teimum førum, tá tað verður mett neyðugt at varðveita heimið hjá hóttum familjum, ofta orsakað av børnunum.

Í øllum hesum førum hevur Almannastovan sum oftast ongan møguleika til t.d. heldur at vísa fólki til eina leiguíbúð, ið hóskar betri til tørvin hjá viðkomandi persóni ella familju.

Heimildin til at geta hesar veitingar afturgjaldsskyldugar er einans ætlað at verða nýtt í teimum førum, har tað í dag tykist ógvuliga órímiligt, at tann virðisøking, ið fólk fáa av hesum almennu veitingunum, ikki kunnu krevjast aftur. Sum dømi kann nevnast, at um ein pensiónistur fær eina umfatandi umbygging av sínum sethúsum játtaða frá Almannastovuni og stutta tíð aftaná doyr, so vil tann framda umbyggingin ofta hava økt um virðið av húsum hansara, og hetta kemur so einans arvingunum til góðar, um ognin eftir deyða pensiónistsins verður avhendað. Í hesum førum tykist tað meira rímiligt, at tað almenna í hvussu er kann fáa ein part aftur, svarandi til virðisøkingina. Eitt annað dømi kann vera ein familja, ið fleiri ferðir hevur fingið játtaða skuldarsanering (100.000 - 200.000 kr.) fyri at kunna varðveita heimið orsakað av børnum, men sum so av sínum eintingum selur húsini við stórum vinningi. Í eintum slíkum føri er óbeinleiðis orsøkin til, at ognin kann seljast við vinningi tann, at tað almenna hevur rindað skuld, ið annars vildi verðið tinglýst sum útlegg í ognini.

Tað kann koma fyri, at tað í slíkum førum er best hóskandi, at tað almenna kann fáa ein part av útgoldna stuðulinum afturgoldnan.

Samanumtikið kann sigast, at heimildin er ætlað at verða nýtt við stórsta varðsemi, og er tað ætlanin, at bert ein møgulig virðisøking kann krevjast afturgoldin.

Almannastovan hevur seinastu árini í nøkrum førum treytað eina slíka játtan við, at pant varð tinglisið í ognini. Hetta hevur verið gjørt við heimild í forvaltningsrættsligum reglum um, at treytir kunnu setast í samband við begunstigandi forvaltningsaktir. Hetta er tó ikki nøktandi í longdini, og er tí ynskiligt og neyðugt at fáa eina greiða lógarheimild fyri hesum.

Ad 2.

Í núgaldandi dagpeningalóg er ásett, at Føroya Landsstýri er kærustovnur fyri avgerðum tiknar sambært dagpeningalógini. Í hinum almannalógunum varð hendan sama orðingin í 1989 broytt soleiðis, at landsstýrið fekk heimild til at útleggja hesa uppgávuna til eina kærunevnd.

Viðmerkjast kann, at orsøkin til at dagpeningalógin tá ikki varð broytt tilsvarandi var, at landstýrið tá hevði ætlanir um at samla dagpeningalóggávuna í eini løgtingslóg. (Dagpeningalóggávan hevði við hesum verið yvirtikin, og økið sum so farið í blokk í staðin fyri refusión, sum nú.) Hesar ætlanirnar eru nú sleptar, men av tí, at tað at ætlanin er at fáa sett á stovn eina kærunevnd innan almanna-

økið, er neyðugt eisini at fáa somu heimild í dagpeningalógini, soleiðis at allar avgerðir sambært almannalóggávuni kunnu vera undir somu skipan.

Fyriliggjandi uppskot viðvíkjandi lógarbroytingunum, sum eru umrøddar undir pkt. 1 og 2, er gjørt í samráð við Almannamálaráðið, ið hevur játtað at leggja ynsktu lógarbroytingarnar fyri Fólkatingið, tá tað er samtykt av Løgtinginum.

Annars verður vist til viðmerkingarnar í hjáløgdu lógaruppskotunum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 120/1991: Ígildissetan av ymiskum ríkislógum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 25. mars 1992 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

121. Broyting í løgtingslóg um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy verður gjørd hesa broyting:

§ 3 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om Gymnasium og HF-kursus på Eysturoy.

§ 1.

I lagtingslov nr. 76 af 21. maj 1982 om Gymnasium og HF- kursus på Eysturoy foretages følgende ændring:

§ 3 ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í § 3 í lógini er ásett, úr hvørjum økjum Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy skal taka upp næmingar. Í 1982 varð § 3 sett í lógina fyri at tryggja Studentaskúlanum við Gøtugjógv eitt hóskandi næmingagrundarlag. Tá ið lógin varð smíðað, varð hildið, at studentaskúlanæmingar úr Eysturoynni møguliga heldur vildu fara á studentaskúla í Hoydølum enn við Gøtugjógv, av tí at Føroya Studentaskúli og HF-skeið var ein kendur skúli frammanundan.

Gongdin tey seinastu árini hevur vist, at Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy hevur fingið fótin fastan, so óttin frá 1982 er í dag ógrundaður. Næmingagrundarlagið fyri Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy trýtur ikki, og lógin er tískil ótíðarhóskandi í dag.

Av tí at talið á umsøkjarum, ið ætla sær inn á studentaskúla ella HF-skeið, er so stórt, hava skúlarnir fingið ein annan trupulleika, nevniliga at fáa býtt næmingarnar sínámillum, soleiðis at best fæst burturúr skúlunum, serliga tá hugsað verður um, at vit ikki fáa størri játtanir á økinum.

Við at fylgja § 3 í lógini kunnu einir 3-4 næmingar lættliga volda, at eykaflokkur verður settur á stovn (í einum skúla).

Um haraftrímóti skynsamt verður lagt til rættis og nakrir fáir næmingar úr miðøkinum verða fluttir úr miðøkinum, kann sleppast undan at stovnseta ein tílíkan eykaflokk, sum á studentaskúlastigi kostar umleið 500.000 kr.

Av teimum omanfyri nevndu orsøkum verður hildið, at § 3 ikki er hóskandi í dag, og tískil verður mælt til, at hon verður avtikin.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 121/1991: Broyting í løgtingslóg um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1992 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við Sánal í Skorðuni, rektara á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy, eins og talað hevur verið við Snorra Fjallsbak, rektara í Hoydølum. Fórt varð fram frá skúlasíðuni, at lógin í síni tíð varð gjørd við tí fyri eyga at tryggja Studnetaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy eitt hóskandi næmingagrundarlag og er hetta eydnast, tí lógin hevur býtt Føroyar í tvey økir.

Endamálið við fyrtiliggjandi lógaruppskoti er at spara peningin og er tað tí skilagott at landsskúlafyrisitingin fær heimild at flyta nakrar næmingar millum

økini, soleiðis at samlaða flokkatalið fyri bæði økini verður minst møguligt - prísurin fyri ein flokk er umleið 450.000 kr.

Í løtuni verða eftir galdandi lóg næmingar fluttir millum økini eftir umsókn. Skulu teir kunna flytast uttan umsókn og undir serligum viðurskiftum - sum eisini eru fíggjarlig viðurskifti - verður skotið upp at broyta lógina samsvarandi og í staðin fyri at § 3 í løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 um Studentaskúla og HF - skeið í Eysturoy verður strikað, verður sett fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 3 í løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1992 um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy verður stk. 3 soljóðandi:

"Landsskúlafyrisitingin kann, um serlig viðurskifti gera tað neyðugt, flyta næmingar millum økini nevnd í stk. 1 og stk. 2."

I § 3 i lagtingslov af 21. maj 1982 om Gymnasium og HF-kursus på Eystur oy får stk. 3 følgende ordlyd:

"Undervisningsdirektoratet kan, såfremt særlige forhold gør det nødvendigt, flytte elever mellem områdene, der er nævnt i stk. 1 og stk 2."

Vísandi til omanfyristandandi mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

122. Løgtingslóg um útflutning av fiski og fiskaúrdráttum (99/1990)

Álit

í

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 12. apríl 1991 og undir 1. viðgerð 18. apríl beint í marknaðarnevndina.

Nevndin viðgjørdi málið og varð samd um, at talan var um eitt sera umfatandi og trupult mál.

Ein samd nevnd mælti tí til, at málið fekk víðari viðgerð í marknaðarnevndini sum millumtinganevnd, og at álit varð lagt fram í næstu tingsetu.

Marknaðarnevndin setir uppskot fram samsvarandi hesum, og løgtingið samtykti hin 24. apríl 1991, at málið skuldi viðgerast víðari í næstu tingsetu.

Formaðurin í marknaðarnevndini hevur havt fund við Thomas Arabo, landsstýrismann, Jóannes Madsen, fulltrúa í landsstýrinum, og Kjartan Kristiansen og Suna Ponlsen frá Menningarstovuni.

Í samráð við landsstýrismannin er nýtt uppskot evnað til, sum hevur ávísar broytingar í mun til landsstýrisuppskotið. Hesar broytingar eru í høvuðsheitum endamálsgrein, veitan av trygd til keypara og hvør kann vera útflytari.

Síðani hevur nevndin viðgjørt málið av nýggjum og gjørt smærri broytingar til nýggja uppskotið, umframt at nevndin mælir til, at lógin verður galdandi fyri bæði útflutning og innflutning av fiski og fiskaúrdráttum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Olaf Olsen, Heini Johansen, Henrik Old og Birgir Danielsen) mælir løgtinginum til í staðin fyri uppskot landsstýrisins at samtykkja fylgjandi:

Uppskot

til

Løgtingslóg um inn- og útflutning av fiski og fiskaúrdráttum.

§ 1.

Endamálið við lógini er at tryggja, at innflytarar og útflytarar av vørum til

Lagtingslov om import og eksport af fisk og fiskeprodukter.

§ 1.

Lovens formål er at sikre, at importører og eksportører af varer til eller fra

ella úr Føroyum halda avtalur, sum eru gjørdar við seljarar ella keyparar í útlandinum, bert innflyta ella útflyta vørur, sum lúka krøvini í matvørulógini, og halda innflutningsreglur ávikavist útflutningsreglur, sum eru ásettar sambært millumlandasáttmálum.

Færøerne overholder aftaler, som er indgået med udenlandske sælgere eller købere, kun importerer eller eksporterer varer, der opfylder betingelserne i levnedsmiddelloven, og overholder importbestemmelser henholdsvis eksportbestemmelser, som er fastsat i medfør af internationale forpligtelser.

§ 2.

Lógin fevnir um allan vinnuligan inn- og útflutning av fiski og fiskaúrdráttum til ella úr Føroyum. Landsstýrinum er tó heimilað í kunngerð at ásetra aðra skipan viðvíkjandi veiðu, sum føroysk fiskifør leggja beinleiðis upp í útlandinum ella til útlendsk før og viðvíkjandi veiðu, sum útlendsk fiskifør leggja beinleiðis upp í Føroyum ella til føroysk før.

§ 2.

Loven omfatter enhver erhvervsmæssig import og eksport af fisk og fiskeprodukter til eller fra Færøerne. Landsstyret bemyndiges dog til i bekendtgørelse at fastsætte særlige regler for fangst, som færøske fiskefartøjer losser direkte til udlandet eller til udenlandske fartøjer og for fangst, som udenlandske fiskefartøjer losser direkte til Færøerne eller til færøske fartøjer.

§ 3.

Bert innflytarar og útflytarar, sum landsstýrið hevur løggilt sum innflytarar ella útflytarar, kunnu flyta inn ella flyta út tær vørur, sum nevndar eru í § 2.

§ 3.

Det er kun tilladt importører og eksportører, der af landsstyret har fået autorisation til import eller eksport, at importere eller eksportere de i § 2 nævnte varer.

Stk. 2. Løggilding eftir stk. 1 skal eftir umsókn verða givin innflytarum og útflytarum, sum prógvføra at hava fingið til vega bankatrygd fyri møgulig endurgjaldskrøv. Hendan trygdin má í minsta lagi verða 1% av ársumsetningini, tó í minsta lagi kr. 100.000. Bókað eginogn hjá umsøkjaranum verður at rokna sum fullgóð trygd.

Stk. 2. Autorisation jfr. stk. 1 skal efter ansøgning gives til importører og eksportører, som kan dokumentere at have tilvejebragt bankgaranti for eventuelle erstatningskrav. Garantien skal være på mindst 1% af årsomsætningen, dog mindst kr. 100.000. Ansøgerens bogførte egenkapital er fyldestgørende sikkerhed.

Stk. 3. Innflytarar og útflytarar, sum í minsta lagi 1 ár frammanundan at henda lóg er komin í gildi, hava innflutt ella útflutt fisk ella fiskaúrdráttir

Stk. 3. Importører og eksportører, der i mindst 1 år inden denne lovs ikrafttrædelse har importeret eller eksporteret fisk eller fiskeprodukter efter den hidtil

eftir higartil galdandi skipan, skulu somuleiðis eftir umsókn løggildast eftir stk. 1. Hendan løggilding er tó bert galdandi í 1 ár.

Stk. 4. Landsstýrið útvegar tollvaldinum skrá yvir løggildar innflytarar og útflytarar.

§ 4.

Landsstýrið kann taka løggildingina eftir § 3 hjá einum innflytara ella útflytara aftur, um revsiábyrgd kann verða áløgd honum eftir § 8 í hesi lóg ella eftir § 163 í Borgarlig straffelov nr. 126 frá 15. apríl 1930 við seinni broytingum.

§ 5.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann, um hon hevur illgruna um, at ein vøra ikki lýkur krøvini í matvørulógini ella kunngerðum ella boðum givin við heimild í hesari, geva boð um, at vøran ikki má koma til ávikavist fara av landinum, fyrr enn hon er kannað av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og funnin at lúka hesi krøv. Henda kanning skal fara fram innan rímiliga tíð.

Stk. 2. Verður kanningin ikki gjørd innan rímiliga tíð, ella gevur hon ábending um, at vøran leyk krøvini sambært stk. 1, tá boðini vóru givin, hevur innflytarin ávikavist útflytarin rætt til endurgjald fyri fíggjarliga missin, sum hevur staðist av hoðunum. Kravið má tó verða sett Heilsufrøðiligu Starvsstovuni innan 14 dagar frá tí, at boðini vórðu givin. Góðtekur Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki kravið, kann tað leggjast

gældende ordning, skal ligeledes efter ansøgning autoriseres efter stk. 1. Denne autorisation er dog kun gældende i 1 år.

Stk. 4. Landsstyret udarbejder til brug for toldmyndighederne en oversigt over autoriserede importører og eksportører.

§ 4.

Landsstyret kan fratage en importør eller eksportør autorisationen jfr. § 3, hvis denne kan pålægges strafansvar efter § 8 i denne lov eller efter § 163 i borgerlig straffelov nr. 126 af 15. april 1930 med senere ændringer.

§ 5.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan kan, hvis den har mistanke om, at en vare ikke opfylder betingelserne i lagtingslov om levnedsmidler eller bekendtgørelser eller påbud udstedt med hjemmel i denne, påbyde, at varen ikke må importeres henholdsvis eksporteres, inden den er undersøgt af Heilsufrøðiliga Starvsstovan og konstateret at opfylde disse betingelser. Denne undersøgelse må finde sted inden rimelig tid.

Stk. 2. Finder undersøgelsen ikke sted inden rimelig tid, eller tyder den på, at varen har opfyldt betingelserne jfr. stk. 1, da påbudet blev givet, har importøren henholdsvis eksportøren ret til erstatning for det tab, som påbudet har afstedkommet. Dette krav må dog gøres gældende overfor Heilsufrøðiliga Starvstovan inden 14 dage fra påbudet. Imødekommer Heilsufrøðiliga Starvstovan ikke kravet, kan det indbringes for dom-

fyri rættin innan 14 dagar frá fráboðanini um hesa avgerð.

§ 6.

Áðrenn vøran kemur til ávikavist fer av landinum, skal innflutningsváttan ávikavist útflutningsváttan vera fingin til vega frá tollvaldinum, sum ansar eftir, at innflytarin ávikavist útflytarin er løggildur smb. § 3. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um, undir hvørjum treytum váttanin kann avgreiðast, herundir reglur um neyðug skjøl.

§ 7.

Landsstýrið kann í kunngerð áseta reglur um loyvdar keyps- og søluhættir og um lágmarksprísir.

Stk. 2. Landsstýrið verður somuleiðis heimilað í kunngerð at áseta tær reglur um inn- og útflutning av fiski og fiskaúrdráttum, sum eru neyðugar fyri at lúka millumlanda sáttmálar.

§ 8.

Uttan so, at harðari revsing er uppibor in eftir aðrari lóggávu, verður við bót tann revsaður, ið

1) innflytir ella útflytir vørur uttan longur at lúka treytirnar fyri løggilding, smb. § 3, stk. 2.,

2) innflytir ella útflytir vørur, sum ikki lúka krøvini smb. § 5, stk. 1, ella ikki ger eftir boðum givin við heimild í § 5 stk. 1,

3) ikki heldur § 6, ella reglur givnar við heimild í § 6, ella

stolene inden 14 dage fra meddelelsen af denne afgørelse.

§ 6.

Forinden varen importeres henholdsvis eksporteres, skal importtilladelse henholdsvis eksporttilladelse være indhentet fra toldmyndighederne, som efterser, at importøren henholdsvis eksportøren er autoriseret jfr. § 3. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler for, under hvilke betingelser tilladelsen kan ekspederes, herunder regler om nødvendige dokumenter.

§ 7.

Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte regler om tilladte købs- og salgsmetoder og om mindstepriser.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges endvidere til i bekendtgørelse at fastsætte sådanne regler om import og eksport af fisk og fiskeprodukter, som er nødvendige for at opfylde internationale forpligtelser.

§ 8.

Medmindre strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der

1) importerer eller eksporterer varer uden længere at opfylde betingelserne for autorisation jfr. § 3, stk. 2.,

2) importerer eller eksporterer varer, som ikke opfylder betingelserne jfr. § 5, stk. 1, eller ikke efterkommer påbud givet med hjemmel i § 5, stk. 1,

3) ikke overholder § 6, eller regler fastsat med hjemmel i § 6, eller

4) ikki heldur reglur givnar við heimild í § 7.

Stk. 2. Fyri brot á hesa lóg, ið verða gjørd av partafelagi, lutafelagi ella samsvarandi, kann bótábyrgd verða áløgd felagnum sum slíkum.

4) ikke overholder regler fastsat med hjemmel i § 7.

Stk. 2. For overtrædelser, der begås af aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 9.

Henda lóg kemur í gildi 2 mánaðir eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 15 frá 15. september 1948 um inn- og útflutning, viðgerð og virkan av fiski og fiskaúrdrátti o.ø.

Stk. 2. Kunngerðirnar nr. 21 frá 25. september 1948 um innflytan av fiski, nr. 38 frá 27. apríl 1949 um innflytan av vørum og nr. 62 frá 12. august 1985 um forboð fyri innflutningi av feskum ella saltaði laksi og sílum verða framhaldandi í gildi, í tann mun tær ikki stríða ímóti hesi lóg. Landsstýrið kann tó taka avgerð um, at kunngerðirnar skulu setast heilt ella partvíst úr gildi.

§ 9.

Loven træder i kraft 2 måneder efter dens kundgørelse. Samtidig hermed ophæves lagtingslov nr. 15 af 15. september 1948 om indførsel og udførsel, behandling og tilvirkning af fisk og fiskeriprodukter m.v.

Stk. 2. Bekendtgørelserne nr. 21 af 25. september 1948 om indførsel af fisk, nr. 38 af 27. april 1949 om indførsel af varer og nr. 62 af 12. august 1985 om forbud mod indførsel af fersk eller saltet ørred og laks vedbliver dog at være i kraft for så vidt, som de ikke strider imod denne lov. Landsstyret kan dog bestemme, at bekendtgørelserne helt eller delvis skal opbæves.

Ein minniluti (Edmund Joensen) tekur ikki undir við málinum og átalar at sett verður í gildi lóg, sum ger tað torførari enn neyðugt at verða inn- og útflytari av fiski og fiskaúrdráttum.

Ein annar minniluti (Hergeir Nielsen) tekur støðu í tingsalinum

Ein triði minniluti (Tordur Niclasen) tekur støðu í tingsalinum.

123. Rammuavtala

millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Estlands hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Estland og Skipan millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu rammuavtalu um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Estland, fyribils galdandi frá 20. februar 1992, og fundarsemju frá 20. februar 1992 millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Viðmerkingar:

Hjáløgd er tann fyribils undirskrivaða rammuavtalan millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Estlands hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Estland og fundarsemjan frá 20. februar 1992 um skipan millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Víst verður til frágreiðingina í løgtingsmálinum um fiskiavtalu við Litavia.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 123/1991: Rammuavtala millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Estlands hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Estland og Skipan millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

124. Rammuavtala

millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Letlands hinumegin um sínámillnu fiskirættindi millum Føroyar og Letland og Skipan millum Føroyar og Letland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu rammuavtalu um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Letland, fyribils galdandi frá 19. februar 1992, og fundarsemju frá 19. februar 1992 millum Føroyar og Letland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Viðmerkingar:

Hjáløgd er tann fyribils undirskrivaða rammuavtalan millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Letlands hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Letland og fundarsemjan frá 19. februar 1992 um skipan millum Føroyar og Letland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Víst verður til frágreiðingina í løgtingsmálinum um fiskiavtalu við Litavia.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 124/1991: Rammuavtala millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Letlands hinumegin um sínámillum fiskirætt-indi millum Føroyar og Letland og Skipan millum Føroyar og Letland um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

125. Rammuavtala

millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Litavia hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Litavia og Skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu rammuavtalu um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Litavia, fyribils galdandi frá 3. mars 1992, og fundarsemju frá 3. mars 1992 millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Viðmerkingar:

Hjáløgd er tann fyribils undirskrivaða rammuavtalan millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Litavia hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Litavia og fundarsemjan frá 3. mars 1992 um skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1992. Somuleiðis er føroysk uniseting hjáløgd.

Í februar og mars 1992 høvdu føroyskir og danskir myndugleikar samráðingar við tey 3 baltisku londini, Estland, Letland og Litavia um rammuavtalu um sínámillum fiskirættindi og um fundarsemju um fiskimøguleikar í 1992.

Áðrenn samráðingarnar var uppskot um rammuavtalu gjørt eftir sama leisti sum aðrar rammuavtalur. Partarnir samdust um hesa rammuavtalu, og at arbeiða fyri at avtalan kann verða sett í gildi. Havandi hetta í huga var farið undir samráðingar um fiskimøguleikar í 1992 og at fáa eina fundarsemju hesum viðvíkjandi.

Talan er um býti av fiski, svartkjaftur móti toski. Baltisku londini fingu, við atliti til trupulleikarnar hjá fiskivinnuni eftir broytingarnar í londunum og ta ringu støðuna hjá toskastovninum í Eystursjónum, eitt býtislutfall, ið var eitt sindur hægri enn tað, ið nýtt varð í fiskiveiðiavtaluni við Sovjet. Harafturat komu 2 nýggj fiskasløg, síld og laksur, inn í avtaluna.

Við hesum avtalum við tey 3 baltisku londini eru kvoturnar hjá Føroyum í Eystursjónum komnar uppá næstum sama støði sum í avtaluni við Sovjetsamveldið fyri 1991. Nú er tann samlaða nøgdin av toski sambært avtalurnar við Estland, Letland og Litavia 2.050 tons, ímóti 2.750 tons sambært avtaluna við Sovjet fyri 1991. Somuleiðis eru í avtalunum við baltisku londini 50 tons av laksi og 900 tons av síld.

	Letland	Estland	Litavia	Tilsamans
Svartkjaftur	12.000	6.000	6.000	24.000
Loyvi	9-6-3	3-3-2	6-4-2	13
Føroysk rættindi				
Toskur	1.000	500	550	2.050
Laksur	20	20	10	50
Sild	500	200	200	900
Loyvi	8	8	8	8

Nøgd í tonsum.

Í fundarsemjunum við Estland og Litavia er ásett, at um samstarvsavtalur verða gjørdar millum vinnufyritøkur í Føroyum og ávikavist Estlandi og Litavia, kunnu skip úr hesum londum fáa eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum fiskiøki. Fundarsemja um fiskivinnusamráðingar millum Føroyar og Litavia. Vilnius, 3. mars 1992.

Fundarsemja um fiskivinnusamráðingar millum Føroyar og Litavia. Vilnius, 3. mars 1992.

1. Ein sendinevnd umboðandi føroysku fiskivinnumyndugleikarnar, við Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóra, á odda, og ein sendinevnd umboðandi litavisku myndugleikarnar, við vararáðharranum fyri altjóða búskaparligum samstarvi, Vytautas Gricius, á odda, hittust í Vilnius tann 3. mars 1992 til samráðingar um sínámillum fiskirættindi í 1992.

./. Umboðini í sendinevndunum eru nevnd í hjálagda skjali.

2. Sendinevndirnar tóku til eftirtektar at samráðingar fara fram um rammuavtalu millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Litavia hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Litavia, og at partarnir arbeiða fyri, at avtalan kemur í gildi so skjótt sum til ber.

3. Við atliti til hetta samdust sendinevndirnar um at mæla myndugleikum teirra til hesi sínámillum fiskirættindi í 1992:

a. Føroysku myndugleikarnir loyva litaviskum skipum at fiska upp til 6000 tons av svartkjafti í føroyskum fiskiøki. Í hesum 6000 tonsum er roknað 10% í hjáveiði av makreli. Hesi 6000 tons verða latin í býti við kvoturnar nevndar í 3.b, við atliti til teir serligu trupulleikarnar hjá litavisku fiskivinnu-

ni vegna tær broyttu umstøðurnar og ta ringu støðuna hjá toskastovninum í Eystursjónum.

b. *Litaviska myndugleikarnir loyva føroyskum skipum at fiska:*

550 tons av toski
200 tons av sild
10 tons av laksi

c. Loyvi verður givið 6 litaviskum skipum at fiska í føroyskum fiskiøki, av hesum í mesta lagi 4 í senn.

Á høvuðsøkinum fyri svartkjaftaveiðu, um hetta verður ásett av føroyskum myndugleikum, verður loyvi givið 2 litaviskum skipum at fiska.

d. Loyvi verður givið 8 føroyskum skipum at fiska í litaviskum fiskiøki.

e. Skipini, ið høvdu loyvi at fiska á fiskiøkinum hjá hinum partinum 31. desember 1991, hava hetta loyvi restina av 1992, um hvørgin av partunum ynskir hetta broytt.

f. Báðir partar fara so skjótt sum til ber at boða hinum partinum frá reglunum fyri fiskiskapi, ið eru galdandi fyri hin partin í hansara fiskiøki.

4. Sendinevndirnar samdust um at mæla myndugleikunum til at virka fyri samstarvi millum fiskiløg og virki innan fiskivinnuna hjá báðum pørtum. Um slíkar samstarvsavtalur verða gjørdar, kunnu litavisk skip fáa eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum fiskiøki.

5. Partarnir skulu siga hvør øðrum frá, tá myndugleikarnir hava samtykt fiskirættindini undir grein 3.

Fundarsemja um niðurstøðu av samráðingunum um rammuavtalu um sínámill-um fiskirættindi millum Litavia og Føroyar. Vilnius, 3. mars 1992.

1. Tann 3. mars 1992 hittust ein sendinevnd umboðandi føroysku og donsku myndugleikarnar og ein sendinevnd umboðandi litavisku myndugleikarnar í Vilnius til samráðingar um eina rammuavtalu millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Litavia hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Litavia.

2. Umboðini í sendinevndunum eru nevnd í hjálagda skjali.

2. Sendinevndirnar samdust um orðaljóðið í hjálagda, fyribils undirskrivaða teksti, sum tey vilja mæla stjórnum teirra til at fyrireika til endaliga undirskriving, so skjótt sum til ber.

***Stjórn Litavia* øðrumegin og**
***Danska Ríkisstjórnin* og *Føroya Landsstýri* hinumegin**

- hava Føroya støðu sum ein sjálvstýrandi part av Danska Kongaríkinum í huga;

- hugsa um tann avgerandi týdning, fiskivinnan hevur fyri Føroyar sum landsins týdningarmesti búskaparligi táttur;

- hugsa um tað felags ynski um at varðveita og tryggja skynsama nýtslu av fiskastovnunum í havinum kring strendur teirra;

- hava Havrættarsáttmála Sameindu Tjóða frá 10. desember 1982 í huga;

- ásanna, at viðkanin hjá strandalondunum av teim havøkjum, har tey hava yvirvaldsrætt yvir fiskastovnunum, og at útinningin á hesum økjum av yvirvaldsrættinum viðvíkjandi kanning, nýtslu, varðveiting og stýring av hesum stovnum, skulu fara fram sambært og samsvarandi meginreglunum í altjóðarættinum;

- taka til eftirtektar, at fiskiøkið við Føroyar gongur út á 200 fjórðingar frá landi, at Litavia hevur eitt búskaparligt øki í Eysturssjónum, og at ávikavist Føroyar og Litavia hava yvirvaldsrætt til at kanna, nýta, varðveita og stýra fiskastovnunum innanfyri hetta øki; ynskja at áseta reglur og treytir viðvíkjandi fiskiskapi av felags áhuga;

og eru komin ásamt um hetta:

Grein 1

Hvør partur skal loyva fiskiførum frá hinum partinum at fiska á tí øki, har hann hevur yvirvaldsrætt viðvíkjandi fiskiskapi sambært reglunum niðanfyri.

Grein 2

Út frá tørvinum á skynsamari nýtslu av fiskastovnunum skal hvør partur fyri sítt fiskiøki og fyri eitt ár í senn, tó við fyrivarni fyri broytingar vegna óvæntaðar umstøður, á hóskandi hátt

(a) áseta loyvdu heildarveiðuna av einstøkum ella samtengdum fiskastovnum út frá frægast tøkum vísindaligum úrslitum, og við atliti til hvussu fiskasløgini ávirka hvørt annað, arbeiðið hjá viðkomandi altjóða felagsskapum og øðrum viðurskiftum av týdningi;

(b) aftaná neyðugar samráðingar áseta veiðunøgdir hjá fiskiførum frá hinum partinum, og hvar hesar nøgdir kunnu veiðast.

Báðir partar skulu miða ímóti eini hóskandi javnvág í veiðumøguleikunum hvør hjá øðrum. Tá hesir møguleikar verða ásettir, skal hvør partur hava í huga:

(i) hvat hvør partur er vanur at veiða;

(ii) tørvin á at minka um trupulleikarnar hvør hjá øðrum í tí føri, har neyðugt verður at minka um veiðumøguleikarnar;

(iii) øll onnur viðurskifti av týdningi.

Tiltøk, ið partarnir seta í verk til tess at stýra fiskiskapinum fyri at varðveita ella byggja upp fiskastovnar, so at teir kunnu geva mest møguliga varandi úrtøku, mugu ikki verða soleiðis háttað, at tey forða fyri fullu nýtsluni av fiskirættindunum, ið veitt verða sambært sáttmálan.

Grein 3

Hvør partur kann krevja, at fiskiskapur á hansara fiskiøki, við fiskiførum frá hinum partinum, skal verða treytaður av loyvi.Viðkomandi myndugleiki hjá hvørjum parti skal á hóskandi hátt og til ásetta tíð boða hinum partinum frá navni, skrásetingarnummari og øðrum neyðugum upplýsingum um tey fiskifør, sum eru ætlað at veiða á fiskiøkinum hjá honum. Hin parturin skal síðan geva loyvi, ið samsvara við veiðimøguleikarnar, ið givnir eru undir treytunum í grein 2 (b).

Grein 4

1. Fiskifør hjá øðrum partinum skulu, tá tey fiska á fiskiøkinum hjá hinum partinum, rætta seg eftir teimum varðveitingartiltøkum og øðrum treytum og forskriftum, ið ásett eru av hinum partinum, og eftir reglum og forskriftum fyri fiskiskap hjá hesum partinum.

2. Hóskandi ávaring eigur at verða givin frammanundan um nýggjar reglur, treytir, lógir og reglugerðir.

Grein 5

1. Hvør partur skal taka øll neyðug stig til at tryggja, at ásetingarnar í hesum sáttmála og aðrar viðkomandi reglur verða bildnar av skipum hansara.

2. Hvør partur kann á sínum fiskiøki seta í verk tiltøk samsvarandi altjóða lóg, ið eru neyðug fyri at tryggja, at reglurnar í hesi avtalu verða bildnar av fiskiførum hjá hinum partinum.

Grein 6

Partarnir binda seg til samstarv til tess at tryggja rætta stýring og varðveiting av tí livandi ríkidøminum í havinum og at lætta um neyðugar vísindaligar rann-

sóknir í hesum sambandi, bæði sínámillum og ígjøgnum hóskandi altjóða felagsskapir, serliga viðvíkjandi stovnum av felags áhuga, ið finnast á fiskiøkinum hjá báðum pørtum og á leiðum nærhendis uttan fyri øki teirra.

Grein 7

Partarnir eru samdir um at ráðføra seg hvør við annan um spurningar, ið stinga seg upp, tá ið sáttmálin skal setast í verk og fáast at virka, sum hann eigur.

Um stríð stendst av útlegging ella nýtslu av hesum sáttmála, skulu partarnir samráðast um hetta.

Grein 8

Eingi í hesum sáttmála skal ávirka ella á nakran hátt vera bindandi fyri tey sjónarmið, ið partarnir hava um nakran spurning viðvíkjandi havrætti.

Grein 9

Partarnir vilja virka fyri samarbeiði millum áhugaðar stovnar, feløg og virki í teimum førum, tá hetta hevur áhuga hjá báðum pørtum.

Grein 10

Hesin sáttmáli skal galda øðrumegin fyri Litavia og hinumegin fyri Føroyar.

Grein 11

Hesin sáttmáli fær gildi frá tí degi, tá ið sáttmálapartarnir boða hvørjum øðrum frá, at tann málsviðgerð, ið er neyðug í hesum føri, er fullførd. Til hann fær endaligt gildi, skal hann fyribils galda frá 3. mars 1992.

Grein 12

Hesin sáttmáli hevur gildi í einum byrjunartíðarskeiði uppá 5 ár frá tí degi, hann fær gildi. Uppsigur hvørgin av pørtunum sáttmálan við fráboðan um uppsøgn í minsta lagi 9 mánaðar, áðrenn hetta tíðarskeið er úti, skal hann verða galdandi í onnur 2 ára skeið, treytað av at boð um uppsøgn ikki eru givin í minsta lagi 6 mánaðar, áðrenn eitthvørt slíkt tíðarskeið er úti.

Grein 13

Hesin sáttmáli er skrivaður í trimum eintøkum á føroyskum, donskum og litaviskum. Hvør av hesum tekstunum skal hava sama gildi.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 125/1991: Rammuavtala millum Donsku Ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri øðrumegin og Stjórn Litavia hinumegin um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Litavia og Skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1992.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

126. Broyting í lógini um ítróttarvedding

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ítróttarvedding.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 20. mai 1983 um ítróttarvedding verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 1 verður skoytt uppí:
"Eisini kann landsstýrið veita loyvi til talspæl (lotto) og góðkenna, at veddingin samstarvar við aðrar norðurlendskar veddingar."

2. Í § 1, stk. 2, verður aftaná orðini "veddingina og" sett: "talspælið og um".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om tipning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 20. maj 1983 om tipning foretages følgende ændringer:

1. I § 1, stk. 1 tilføjes:
"Endvidere kan landsstyret meddele bevilling til talspil (lotto) samt godkende, at tipningen samarbejder med andre nordiske tipstjenester."

2. I § 1, stk. 2, indsættes efter ordene "tipningen og": "talspillet og".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Við heimild í løgtingslóg nr. 50 frá 20. mai 1983 um ítróttarvedding fór P/F Ítróttarvedding í 1984 undir ítróttarvedding í Føroyum.

Eftir lógini fekk felagið einkarrætt til alla ítróttarvedding í Føroyum, og veddingin fór fram í 1984 og 1985 og steðgaði so upp, tí eingin áhugi var fyri at luttaka í føroysku veddingini, tí vinningarnir gjørdust alt ov smáir.

Danska mentamálaráðið, ið hevði játtað einar 300-400 kr. árliga í studningi frá donsku veddingini til ymisk endamál í Føroyum, gavst við at lata henda studning, nú Føroyar høvdu fingið sína egnu vedding.

Ítróttarsamband Føroya, sum hevur arbeitt við at fáa veddingina at virka aftur, hevur mett tað neyðugt, at P/F Ítróttarvedding umframt veddingina, eisini fær loyvi til talspæl (lotto), sum danska veddingartænastan nú eisini er farin undir.

Ítróttarsambandið metir eisini, at roynt eigur at vera við samarbeiði við norðurlendskar veddingar og hevur beitt á landsstýrið um eisini at gera neyðuga broyting í lógini hesum viðvíkjandi.

Landsstýrið tekur undir við ynskjunum frá Ítróttarsambandinum um neyðugar broytingar í lógini, so ítróttarveddingin møguliga kann fáast at virka aftur, og setir fram uppskot samsvarandi hesum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 126/1991: Broyting í lógini um ítróttarvedding.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd fíggjarnevnd undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

127. Tekstvarp til Sjónvarp Føroya

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at Sjónvarp Føroya kann fara at senda tekstvarp á heysti 1992.

Viðmerkingar:

Í Føroyum hava vit bert tveir elektroniskar fjølmiðlar útvarp og sjónvarp, men í hinum norðanlondum hava tey eisini tann triðja - tekstvarp. Í Noreg, Svøríki og Danmark hava teir havt hendan fjølmiðil í fleiri ár, og í september 1991 fingu íslendingar eisini tekstvarp. Tekstvarp er bíligasti elektroniski fjølmiðilin at reka, og mangastaðni verður hetta mett sum ein framtíðar fjølmiðil á støði við útvarp og sjónvarp.

Tekstvarp er skrivaðar upplýsingar á sjónvarpsskýggja. Hvør einstakur sjónvarpshyggjari kann heinta taka upplýsingarnar fram á sínum egna sjónvarpsskýggja, sum longu frammanundan eru innskrivaðar, og tað er hyggjarin sjálvur heima, sum velur, nær hann skal lesa upplýsingarnar.

Fyri tann partin av fólki, sum ikki hoyra væl, er hesin fjølmiðil serliga vælegnaður. Upplýsingarnar, sum kunnu koma eins skjótt og í útvarpi, kunnu lesast. Tí er tekstvarp eitt serligt hjálpitól til teirra, sum ikki hoyra væl.

Í grannalondum okkara verður tekstvarp fyrst og fremst brúkt til tænastu. Tað ber til gjøgnum tekstvarp at síggja t.d. alla ferðaætlanina hjá Strandferðsluni og Bygdaleiðum, boða frá flogfeløgum, skipafeløgum, sum røkja millumlandasigling, valutakursir, veðurtíðindi og koyrilikindi. Sjónvarpsskrá og útvarpsskrá er eisini á tekstvarpi við umrøðu av teimum einstøku sendingunum.

Sjálvandi ber eisini til at brúka tekstvarp til tíðindaflutning, og í hinum norðurlondunum - Ísland enn undantikið - senda teir hvørjum øðrum tíðindi á síðum í tekstvarpi. Tað vil siga, at í norska tekstvarpinum ber eisini til at finna síður við donskum og svenskum tíðindum o.s.fr.

Í samband við, at vit hava fingið uppboðssølu av fiski, ber eisini til at vísa fiskaprísirnar á skýggjanum. Eftir okkara meting fer tað, at fólk sleppa at fylgja við prísinum á fiski heima, eisini at fáa føroyingar aftur at viðurkenna, at fiskur og fiskaprísir eru grundarlagið undir føroyska samfelagnum. Sjálvandi ber tá eisini til at vísa, hvussu prísirnir eru í øðrum londum.

Tekstvarp kann eisini brúkast til lýsingar. Í íslendska ríkisútvarpinum verða ognir og bílar lýst til sølu í tekstvarpi. Tað kann altíð tosast um, hvat ein almennur fjølmiðil eigur at taka pening fyri. Eftir okkara meting eigur tað at vera soleiðis, at tá ið tað snýr seg um ítøkiligar upplýsingar frá øðrum stovnum og sølulýsingar, so eigur Sjónvarp Føroya at fáa pening fyri tænastuna. Er hinvegin talan um veður og koyrilíkindi, so eigur hetta at verða ein tænasta.

Kanningar, sum Sjónvarp Føroya hevur gjørt, vísa, at tekstvarp kann setast á stovn uttan serliga stórar tekniskar fløgur - millum 200.000 og 400.000 krónur.

Í ásannan av, at tekstvarp er í øllum grannalondum okkara, og at tað er ein fjølmiðil, sum kann leggjast í ein verandi, og sum hevur ógvuliga stórar møguleikar, verður hetta uppskot sett fram.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 127/1991: Tekstvarp til Sjónvarp Føroya.

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 26. mars 1992 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við umboð fyri Sjónvarp Føroya, ið upplýstu at arbeitt verður við málinum. Greitt varð frá, at roknað verður við einari tekniskari fløgu uppá umleið 200 - 400.000 krónur, at ávísar ætlanir eru, um hvussu henda fløga skal fíggjast, eins og tað er ætlanin at teksting-ar arbeiði skal gerast free-lance - við akkordgjaldi pr. linju - og at sostatt samlaða fløgan og rakstur kann koma at hvíla í sær sjálvum.

Upplýst varð, at sjónvarpsnevndin er kunnað um hesi viðurskifti eins og avvarandi landsstýrismaður. Undirstrikað var, at ætlanin ikki er at fara út í eina kapping við aðrar fjølmiðlar, og umhugsað verður at hava styttri sendingar beint áðrenn og aftaná vanligar sendingar eisini. Um ætlanin heldur, fer hetta at virka í september 1992.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjarni Djurholm, Jógvan A. Johannessen, Mikkjal Sørensen og Signar Hansen) vísir á, at tá ið Sjónvarp Føroya arbeiðir við hesum máli, og ætlanin er, at tað kemur í gongd í september 1992, setir meirilutin einki uppskot fram.

Minnilutin (Terje Davidsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

128. Løgtingslóg um fiskivinnu

Uppskot

til

Løgtingslóg um fiskivinnu.

§ 1.

Fyri at føroysk fiskifar kann fáa fiskiloyvi á føroysku landleiðini ella loyvi at veiða burtur av kvotum, sum Føroyar hava sambært avtalu við annað land, ella fyri at fáa almennan stuðul til bygging av fiskifari, skulu hesar treytir vera loknar:

1. Í partafeløgum, lutafeløgum, samtøkum og líknandi, sum eiga fiskifar, skulu fiskimenn ella útróðrarmenn eiga í minsta lagi 60% av partapeninginum o.l.
2. Viðtøkurnar í feløgunum skulu hava ásetingar um, at 60% av innskotspeninginum kann bert latast ella avhendast fiskimonnum ella útróðrarmonnum.
3. Viðtøkurnar skulu hava ásetingar um, at nevndinarsamtykt krevst fyri at fáa loyvi at avhenda partabrøv v. m.
4. Fyri einstakling ella einstaklingar, sum taka seg saman, eru somu treytir galdandi sum í pkt. 1, 2 og 3.

§ 2.

Sum fiskimaður ella útróðrarmaður sambært hesi lóg er at skilja persónur, sum í minsta lagi hevur vunnið 3/5 av

Lagtingslov om fiskerihverv.

§ 1.

For at færøske fiskefartøjer kan få fiskeritilladelse på det færøske fiskeriterritorium eller tilladelse til delvis fiskeri af kvoter, som Færøerne har i henhold til aftale med andet land, eller for at få offentlig støtte til byggeri af fiskefartøj, skal disse betingelser opfyldes:

1. I Aktieselskaber, andelsselskaber, sammenslutninger og lignende, der ejer fiskefartøj, skal fiskerens og hjemmefiskernes andel udgøre mindst 60 % af aktiekapitalen.
2. Vedtægterne i fællesskaberen skal indeholde regler om, at 60% af indskudspakitalen kan kun overtages eller afhændes til fiskere eller hjemmefiskere.
3. Vedtægterne skal have bestemmelser, om at der kræves bestyrelsesvedtagelse for at få tilladelse at afhænde aktier m. m.
4. For person eller personer, som slutter sig sammen, er de samme betingelser gældende som i pkt. 1, 2 og 3.

§ 2.

Som fisker eller hjemmefisker i henhold til loven anses person, som har indtjent mindst 3/5 af sin bruttoindtægt

sínari bruttoinntøku við fiskiskapi álmanakkaárið fyri ella hevur vunnið 3/5 av sínari bruttoinntøku í einum samanhangandi 12 mánaða skeiði í einum 3-ára skeiði frammanundan, at hann gerst eigari í fiskifari.

§ 3.

Einstaklingar, partafelag, lutafelag, samtøkur og onnur, sum róku vinnuligan fiskiskap, áðrenn henda lóg kom í gildi, varðveita rættin at reka fiskiskap.

Stk. 2. Verður veiðiorkan tilsamans hjá fiskifari ella fiskifórum, sum einstaklingar ella feløg sbrt. stk. 1 eiga, økt í mun til ta veiðiorku, sum var, tá henda lóg kom í gildi, skulu hesir einstaklingar og feløg lúka treytirnar í § 1.

§ 4.

Landsstýrið setir í kunngerð nærri reglur sbrt. hesi lóg.

§ 5.

Brot á hesa lóg verða revsað við bót, um ikki harðari revsing er uppiborin.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ved fiskeri i kalenderåret før eller har indtjent 3/5 af sin bruttoindtægt i en sammenhængende 12 måneders periode i en 3-årig periode, inden han bliver ejer i fiskefartøj.

§ 3.

En person, aktieselskab, andelsselskab, sammenslutninger og andre, som drev fiskeri, inden denne lov trådte i kraft, beholder retten at drive fiskeri.

Stk. 2. Forøges den totale fangstkapacitet for et fiskefartøj eller fiskefartøjer, som personer eller selskaber i henhold til stk. 1 i forhold til den fangstkapacitet, som var, da denne lov trådte i kraft, skal disse personer og selskaber opfylde betingelserne i § 1.

§ 4.

Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler i henhold til denne lov.

§ 5.

Overtrædelser af denn lov straffes med bøde, hvis ikke strengere straf er forskyldt.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Gongdin hevur tey seinast árini verið, at ognarrætturin til veiðiflotan er á alsamt færri hondum. Tað var tann tíð, tá nógvir útróðrarbátar vóru, sum útróðrarmenn sjálvir áttu, men talið á útróðrarbátum er minkað.

Somuleiðis áttu fiskimenn mong av teimum línuskipum, sum vóru bygd í 1959 og 1960 árunum. Men nú er tað sjáldsamt, at fiskimenn eiga skipini.

Tað er neyvan nakað at ivast í, at bæði skiparakstur og stovnrøkt høvdu verið betri, um fiskimenn og útróðrarmenn høvdu átt størri part av fiskiflotanum. Fram um øll onnur, eru teir hugaðir at hava skipini í vinnu og at røkja fiskastovnarnar.

At kalla allur fiskiflotin er gamal. Roknast má tí við, at farið verður undir endurnýgging av fiskiflotanum heilt skjótt. Tað er tí rætt longu nú at áseta reglur um, hvør kann eiga tey fiskifør, sum verða bygd.

Skotið verður tí upp, at einstaklingur sum rekur fiskivinnu skal vera fiski- ella útróðrarmaður, og at fiski- ella útróðrarmenn skulu eiga í minsta lagi 60% av partapeninginum í partafeløgum og øðrum feløgum, sum reka fiskivinnu.

Fiski- ella útróðrarmaður er eftir hesi lóg ein persónur, sum hevur vunnið 3/5 av sínari inntøku við fiskiskapi álmanakkaárið fyri, ella sum hevur vunnið 3/5 av sínari inntøku við fiskiskapi í einum samanhangandi 12 mánaða skeiði í einum 3 áraskeiði frammanundan.

Teir einstaklingar og feløg, sum reka fiskiskap, tá henda lóg kemur í gildi, varðveita henda rætt.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 128/1991: Løgtingslóg um fiskivinnu.

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot Tjóðveldisfloksins.

Ein triðji minniluti (Niels Pauli Danielsen) tekur støðu í tingsalinum.

129. Broyting í fólkaskúlalógini

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979 um fólkaskúlan verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Fólkaskúlin er ein sjey ára grundskúli og ein trý ára framhaldsskúli."

2) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Undirvísingarligt samarbeiði kann vera millum framhaldsskúlan og aðrar undirvísingarstovnar."

3) § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Landsskúlaráðið kann gera reglur fyri samarbeiðinum eftir stk. 2."

4) Í § 4 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Undirvísingarligt samstarv kann verða skipað lærugreinanna millum í flokkinum."
Stk. 2 verður hereftir stk. 3.

5) § 5 verður orðað soleiðis:
"Undirvísingin í 8. og 9. flokki er fyri allar næmingar: føroyskt, danskt, enskt, landalæra, lívfrøði, søga/samtíð, kristnikunnleiki og rokning/støddfrøði."

6) § 6, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Umframt ta undirvísing, ið skal verða givin sambært § 5, verða hesar lærugreinir at standa næmingunum í 8. og 9. flokki í boði:

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om folkeskolen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 21 af 22. marts 1979 om folkeskolen foretages følgende ændringer:

1) § 3, stk. 1 affattes således:
"Folkeskolen omfatter en syvårig grundskole og en treårig fortsættelsesskole."

2) § 3, stk. 2 affattes således:
"Der kan etableres undervisningsmæssigt samarbejde mellem fortsættelsesskolen og andre undervisningsinstitutioner."

3) § 3. stk. 3 affattes således:
"Undervisningsrådet kan fastsætte regler for samarbejdet efter stk. 2."

4) I § 4 indsættes som nyt stk. 2:
"Tværfagligt undervisningssamarbejde kan etableres i klassen."
Stk. 2 bliver herefter stk. 3.

5) § 5 affattes således:
"Undervisningen i 8. og 9. klasse omfatter for alle elever: færøsk, dansk, engelsk, geografi, biologi, historie/samtid, kristendomskundskab og regning/matematik."

6) § 6, stk. 1 affattes således:
"Udover den undervisning, som skal gives efter § 5, tilbydes følgende fag elever i 8. og 9. klasse:

1. Týskt og latín.
2. Alis-/evnafrøði.
3. Sjóvinna.
4. Landbúnaður.
5. Ítróttur.
6. Maskinskriving, dátulæra og roknskaparførsla.
7. Tilevning, sangur/tónleikur, hand arbeiði, heimkunnleiki, smíð og motorlæra.
8. Arbeiðskunnleiki."

Stk. 3, 4 og 5 verða ávikavist stk. 2, 3 og 4.

7) § 7 verður strikað.

8) § 8 verður orðað soleiðis:

"Undirvísingin í 10. flokki er fyri allar næmingar: føroyskt, danskt, samtíð og kristnikunnleiki.

Stk. 2. Umframt ta undirvísing, ið skal verða givin sambært stk. 1, verða hesar lærugreinir at standa næmingunum í 10. flokki í boði:

1. Rokning/støddfrøði.
2. Alisfrøði og evnafrøði.
3. Enskt, týskt og latín.
4. Ítróttur.
5. Maskinskriving, dátulæra og roknskaparførsla.
6. Sjóvinna.
7. Landbúnaður.
8. Søga, landalæra og lívfrøði.
9. Tilevning, sangur / tónleikur, handarbeiði, heimkunnleiki, smíð og motorlæra.
10. Arbeiðskunnleiki."

9) § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Næmingum í 10. flokki kann standa í boði verkætlanararbeiði og evniskunnandi undirvísing."

1. Tysk og latin.
2. Fysik/kemi.
3. Sønæring.
4. Landbrug.
5. Idræt.
6. Maskinskrivning, datalære og regnskabsføring.
7. Formning, sang/musik, håndarbejde, hjemkundskab, sløjd og motorlære.
8. Arbejdskendskab."

Stk. 3, 4 og 5 bliver henholdsvis stk. 2, 3 og 4.

7) § 7 ophæves.

8) § 8 affattes således:

"Undervisningen i 10. klasse omfatter for alle elever: færøsk, dansk, samtid og kristendomskundskab.

Stk. 2. Udover den undervisning, som skal tilbydes i henhold til stk. 1, tilbydes følgende fag elever i 10. klasse:

1. Regning/matematik.
2. Fysik og kemi.
3. Engelsk, tysk og latin.
4. Idræt.
5. Maskinskrivning, datalære og regnskabsføring.
6. Sønæring.
7. Landbrug.
8. Historie, geografi og biologi.
9. Formning, sang/musik, håndarbejde, hjemkundskab, sløjd og motorlære.
10. Arbejdskendskab."

9) § 9, stk. 1 affattes således:

"Undervisningen for elever i 10. klasse bør omfatte projektarbejde og projektorienteret undervisning."

10) § 9, stk. 5, sum hereftir verður stk. 2, verða orðini "§ 22, 2. stk." broytt til: "§ 22, stk. 5."

Stk. 6 og 7 verða hereftir stk. 3 og 4.

11) § 10 verður strikað.

12) § 12 verður orðað soleiðis:

"Til hvønn flokk verður settur ein flokslærari."

Stk. 2. Landsskúlaráðið ger reglur um flokslærarans uppgávur."

13) § 16, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"Foreldrini, smbrt. § 53, og næmingurin taka í samráð við skúlan avgerð um val av lærugreinum smb. § 6, § 8, stk. 2 og § 9, stk. 2 og um framhaldandi skúlagongd."

14) § 17 verður orðað soleiðis:

"Fólkaskúlin eigur at vera flokksbýttur saunsvarandi § 23. Í ársbýttum skúlum eigur hvørt flokksstigið at verða undirvíst sær.

Stk. 2. Hóast skúli er ársbýttur, kann undirvísing fara fram tvørtur um floksbýtið."

Stk. 3 verður strikað.

15) § 20, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"Tá ið undirvísingin í 10. flokki endar, verður víðkaða fráfaringarroynd fólkaskúluns í hesum lærugreinum: føroyskum, donskum, enskum, týskum, rokning/støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði."

16) § 20, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"Í lærugreinunum kristnikunnleika, søgu/ samtíð, landalæru, lívfrøði, latíni, handarbeiði, smíði, heimkunnleika, maskinskriving og roknskaparførslu verður fráfaring-

10) I § 9, stk. 5, som herefter bliver stk. 2, ændres ordene "§ 22, stk. 2" til: "§ 22, stk. 5."

11) § 10 ophæves.

12) § 12, stk. 1 affattes således:

"Hver klasse tildeles en klasselærer."

Stk. 2. Klasselærerens opgaver fastsættes af undervisningsrådet."

13) § 16, stk. 3 affattes således:

"Forældrene, jfr. § 53 og eleven tager i samråd med skolen afgørelse om valg af fag, jfr. § 6, § 8, stk. 2 og § 9, stk 2, og om fortsat skolegang."

14) §17 affattes således:

"Folkeskolen bør i henhold til § 23 være klassedelt. I årgangsdelte skoler bør hvert klassetrin undervises særskilt.

Stk. 2 Selv om en skole er årgangsdelt, kan undervisning ske på tværs af klasseopdeling."

Stk. 3 ophæves.

15) § 20, stk. 2 affattes således:

"Ved afslutning af undervisningen i 10. klasse afholdes folkeskolens udvidede afgangsprøve i følgende fag: Færøsk, dansk, engelsk, tysk, regning/- matematik, fysik og kemi."

16) § 20, stk. 3 affattes således:

"I fagene kristendomskundskab, historie/ samtid, geografi, biologi, latin, håndarbejde, sløjd, hjemkundskab, maskinskrivning og regnskabsføring afholdes folkeskolens

arroynd fólkaskúlans, tá ið undirvísingin endar."

17) Í § 20 verður sum nýtt stk. 4 sett:

"Landsskúlafyrisitingin kann gera av, at eingin roynd verður í ávísum lærugreinum og/ella lærugreinarpørtum hvørt royndarskeiðið. Ársmet í viðkomandi lærugreinum/-lærugreinarpørtum telur tá sum royndarmet."

Stk. 4 og 5 verða hereftir stk. 5 og 6.

18) § 22 verður orðað soleiðis:

"Skúlaárið byrjar 1. august, og er tað vanliga 200 skúladagar.

Stk. 2. Landsskúlaráðið skipar tað árliga talið á frídøgum og frítíðum, og nær summarfrítíðin byrjar.

Stk. 3. Dagliga undirvísingartíð næmninga má í mesta lagi vera:

1) Í 1. og 2. flokki 5 tímar
2) í 3.-5. flokki 6 tímar
3) í 6. og 7. flokki 7 tímar
4) í framhaldsskúlanum 8 tímar.

Stk. 4. Undirvísingartíð næminga verður roknað í undirvísingartímum, og er 1 tími 45 minuttir.

Stk. 5. Við atliti at luttøku næmingunum í setursskúla, starvsprak tikk ella tílíkum kann vanliga skipanin av undirvísingini í einum flokki verða steðgað fyribils eitt tímatal. ið svarar til í mesta lagi 10 skúladagar árliga í 1.-7. skúlaári, 20 skúladagar í 8. flokki, 30 skúladagar í 9. flokki og í 10. flokki so nógv, sum neyðugt er, sbrt. § 9, stk. 2."

afgangsprøve ved undervisningens afslutning."

17) § 20 indsættes som nyt stk. 4:

"Undervisningsdirektoratet kan beslutte, at der ikke afholdes prøve i bestemte fag og/eller dele af fag hver prøvetermin. Årskarakter i vedkommende fag/dele af fag tæller i så fald som prøvekarakter."

Stk. 4 og 5 bliver herefter stk. 5 og 6.

18) § 22 affattes således:

"Skoleåret begynder den 1. august og omfatter normalt 200 skoledage.

Stk. 2. Undervisningsrådet fastsætter det årlige antal fridage og fritider samt sommerferiens begyndelsestidspunkt.

Stk. 3. Elevernes dagige undervisningstid må højst omfatte:

1) I 1. og 2. klasse 5 timer.
2) I 3.-5. klasse 6 timer.
3) I 6. og 7. klasse 7 timer.
4) I fortsættelsesskolen 8 timer.

Stk. 4. Elevernes undervisningstid regnes i undervisningstimer á 45 minutter.

Stk. 5. Med henblik på elevernes deltagelse i lejrskoleophold, erhvervspraktik eller lignende kan undervisningen i en klasse indstilles i et timetal svarende til højst 10 skoledage årligt i 1.-7. årgang, 20 skoledage i 8. årgang, 30 skoledage i 9. årgang og i 10 årgang i fornødent omfang, jvf. § 9, stk. 2."

19) Sum nýggj § 22 a verður sett:

"Í ársbýttum grundskúla eigur vikutímatal næminganna at vera í minsta lagi 182 undirvísingartímar.

Stk. 2. Undirvísingartímatal næminganna í hvørjum flokki eigur í minsta lagi at vera:

1) í 1. flokki 18 tímar
2) í 2. flokki 20 tímar
3) í 3. flokki 24 tímar
4) í 4. flokki 28 tímar
5) í 5. flokki 30 tímar
6) í 6. flokki 31 tímar
7) í 7. flokki 31 tímar.

Stk. 3. Loyvt kann vera ársbýttum skúlum at flyta í mesta lagi 2 undirvísingartímar millum flokkar. Tað í stk. 1 nevnda tímalágmark eigur tó ikki at verða broytt av hesi orsøk.

Stk. 4. Í grundskúlum, sum ikki eru ársbýttir, og sum kunnu hava næmingar øll grundskúlaárini, eigur vikutímatal næminganna í tí einstaka skúlanum at verða lagað eftir næmingatali og aldursbýti næminga, og skal tað í minsta lagi vera:

1) í 1-flokkaðum skúla 15 tímar
2) í 2-flokkaðum skúla 40 tímar
3) í 3-flokkaðum skúla 70 tímar
4) í 4-flokkaðum skúla 100 tímar
5) í 5-flokkaðum skúla 120 tímar
6) í 6-flokkaðum skúla 145 tímar.

Stk. 5. Lágmarkið í vikutímatali næminganna eftir stk. 4 er bert galdandi í teimum skúlastøddum, ið hava samsvarandi næmingalágmark eftir § 23, stk. 1.

19) Som ny § 22 a indsættes:

"I årgangsdelt grundskole bør elevernes ugentlige timetal mindst omfatte 182 undervisningstimer.

Stk. 2. Elevernes undervisningstimetal i hver klasse bør ikke være mindre end:

1) i 1. klasse 18 timer
2) i 2. klasse 20 timer
3) i 3. klasse 24 timer
4) i 4. klasse 28 timer
5) i 5. klasse 30 timer
6) i 6. klasse 31 timer
7) i 7. klasse 31 timer.

Stk. 3. Det tillades årgangsdelte skoler maksimalt at flytte 2 undervisningstimer mellem klasser. Dog bør dette ikke foranledige forandringer i den i stk. 1 nævnte minimumsgrænse.

Stk. 4. I ikke-årgangsdelte grundskoler, der kan omfatte elever fra 1.-7. skoleår, bør elevernes ugentlige timetal i den enkelte skole tilpasses elevernes antal og aldersopdeling, og det skal mindst omfatte:

1) i skole med 1 klasse 15 timer
2) i skole med 2 klasser 40 timer
3) i skole med 3 klasser 70 timer
4) i skole med 4 klasser 100 timer
5) i skole med 5 klasser 120 timer
6) i skole med 6 klasser 145 timer.

Stk. 5. Det i stk. 4 anførte minimums timetal for eleverne gælder kun for de skoleenheder, som har tilsvarende minimums antal elever i henhold til § 23, stk. 1.

Stk. 6. Landsskúlafyrisitingin ásetir eftir nærri reglum vikutímatal skúfanna og kann í serstøkum føri víkja frá ásetingunum í stk. 1-5.

Stk. 7. Landsskúlaráðið ger reglur um tíma- og lærugreinabýti."

20) § 23 verður orðað soleiðis:

"Tann einstaki skúlin verður býttur sundur í flokkar eftir hesum meginreglum:

1) Skúlar, ið hava millum 1 og 14 næmingar, eru 1-flokkaðir.
2) Skúlar, ið hava millum 15 og 30 næmingar, eru 2- flokkaðir.
3) Skúlar, ið hava millum 31 og 48 næmingar, eru 3- flokkaðir.
4) Skúlar, ið hava millum 49 og 68 næmingar, eru 4- flokkaðir.
5) Skúlar, ið hava millum 69 og 90 næmingar, eru 5 flokkaðir.
6) Skúlar, ið hava millum 91 og 114 næmingar, eru 6- flokkaðir.
7) Skúlar, ið hava meir enn 115 næmingar, eru 7-flokkaðir og ársbýttir.

Stk. 2. Næmingatalið í grundskúlans flokkum eigur vanliga ikki at fara upp um 24 við skúlaárs byrjan.

Stk. 3. Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum føri víkja frá ásetingunum í stk. 1 og 2."

21) Í § 27 verður sett sum nýtt stk. 3:

"Skúlamyndugleikarnir á staðnum kunnu í serstøkum føri loyva, at ásetingarnar í stk. 1 og 2 eisini eru galdandi fyri næmingar, ið eru eldri enn 18 ár."

Stk. 6. Undervisningsdirektoratet fastsætter efter nærmere regler skolernes ugentlige timetal og kan i særlige tilfælde gøre afvigelse fra bestemmelserne i stk. 1-5.

Stk. 7. Undervisningsrådet udfærdiger regler om time- og fagfordeling."

20) § 23 affattes således:

"Den enkelte skole opdeles i klasser efter følgende hovedregler:

1) Skoler med 1-14 elever har én klasse.
2) Skoler med 15-30 elever har 2 klasser.
3) Skoler med 31-48 elever har 3 klasser.
4) Skoler med 49-68 elever har 4 klasser.
5) Skoler med 69-90 elever har 5 klasser.
6) Skoler med 91-114 elever har 6 klasser.
7) Skoler med over 115 elever har 7 klasser og årgangsdelte.

Stk. 2. Elevantallet i grundskolens klasser bør normalt ikke overstige § 24 ved skoleårets begyndelse.

Stk. 3. Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde fravige bestemmelserne i stk. 1 og 2."

21) I § 27 indsættes som nyt stk. 3:

"De lokale skolemyndigheder kan i særlige tilfælde tillade, at bestemmelserne i stk. 1 og 2 også er gældende for elever, der er ældre end 18 år."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. august 1992.

Stk. 2. Tó fáa § 5, § 6, stk. 1, § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1 og § 20, stk. 3 og 4 gildi frá 1. august 1993.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. august 1992.

Stk. 2. Dog træder § 5, § 6, stk. 1, § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1 og § 20, stk. 3 og 4 i kraft 1. august 1993.

Viðmerkingar:

Í 1979 kom núgaldandi fólkaskúlalóg, og við hesi lóg fingu vit nýtt hugtak og endamál fyri føroyska fólkaskúlan. Vit fingu nýggjar skiparir í skútaverkinum, og vit fingu heimildir at skipa undirvísingina á nýggjan hátt. Nógv av hesum var ókent og nýtt bæði fyri næmingar, lærarar og foreldur. Í hesi 13 árini hevur tað víst seg, at nakrar av teimum skipanum, sum eru ásettar í lógini, eru óhepnar, øðrum er tíðin farin frá, og nakrar heimildir eru ongantíð nýttar. Men hóast hetta eru ongar lógarbroytingar framdar í fólkaskúlalógini.

Landsstýrið heitti tí seinasta heyst á landsskúlastjóran um at geva lesiætlanarnevndini fyri fólkaskúlan, ið sitið hevur síðan 1987, nýggja arbeiðsskrá, har nevndin verður biðin um at koma við uppskotum um broytingar í fólkaskúlalógini, sum tíl ber at fremja nú.

Lesiætlanarnevndin varð víðkað við 3 fólkum og fór til verka, og longu 6. februar 1992 greiddi hon úr hendum álit um broytingar og dagføringar av løgtingslóg um fólkaskúlan. Á fundi 25. februar 1992 tók landsskúlaráðið undir við álitinum og mælti til at fremja broytingarnar.

Hóast landsstýrið kann taka undir við so at siga øllum teimum broytingum, sum verða skotnar upp í álitinum hjá lesiætlanarnevndini, hevur landsstýrið tikið ta avgerð ikki at fremja tær allar nú.

Broytingarnar, sum skotnar verða upp her, broyta óhepnar skiparir, loysa bindingar, geva skúlunum meira sjálvsavgerðarrætt, samstundis sum næmingunum verður tryggjað forsvarlig skúlagongd.

Men landsstýrið ásannar, at fleiri broytingar og dagføringar eru neyðugar, og kann álitið hjá lesiætlanarnevndini vera grundarlag fyri hesum arbeiði í komandi tíð. Álitið verður lagt hjá sum skjal í málinum.

Lógaruppskotið til broytingar í fólkaskúlalógini, sum her verður lagt fyri tingið, hevur ikki tær stóru innihaldsligu broytingarnar við sær fyri grundskúlan. Lærugreinarnar verða ikki broyttar, men skotið verður upp at heimila samstarvi millum lærugreinir á teimum ymsu floksstigunum.

Ein broyting er ásetanin av tímatali á teimum ymsu floksstigunum. Ein onnur er reglan um tann floksbýtta skúlan, og tann triðja er viðvíkjandi næmingatalinum í hvørjum flokki. Broytingarnar, sum verða skotnar upp í sambandi við hesar spurningar, eru ikki stórar, men tær loysa upp fyri nøkrum av teimum bindingum, sum liggja í núverandi lóg.

Men sum nakað nýtt verður ásett, hvussu stórt tal av undirvísingartímum næmingarnir í grundskúlanum í minsta lagi skulu hava. Sambært broytingaruppskotinum verður undirvísingartímatalið í teimum fyrstu flokkunum økt, meðan tað verður lækkað eitt lítið sindur í teimum elstu flokkunum. Eisini fyri teir smáu skúlarnar verður ásett, hvussu nógvar tímar, næmingarnir skulu hava um vikuna. Samstundis verður eisini ásett, hvussu langa undirvísingartíð næmingurin í mesta lagi má hava um dagin í teimum ymisku flokkunum.

Av øðrum broytingum kunnu nevnast, at sjálvt hugtakið floksfæraraskipanin verður styrkt, meðan hin vegin ásetingin í lógini av floksins tíma og skipanin hesum viðvíkjandi er vorðin miðfirrað til skúlamyndugleikarnar á staðnum. Henda skipan hevur tó bert virkað fyri framhaldsskúlan.

Tær flestu broytingarnar viðvíkja framhaldsdeild fólkaskútans. Í nógv ár hevur verið tosað um støðu 10. floks í fólkaskúlanum, og við broytingini verður dentur lagdur á, at 10. flokkur er ein sjálvsagdur partur av fólkaskúlanum.

Í verandi fótkaskúlalóg eru landalæra og lívfrøði tilboðslærugreinir, og ofta hevur verið víst á, at vandi er fyri, at næmingar framhaldsskúlans ikki fáa nóg hollan kunnleika um hesi týdningarmiklu lærugreinaøki, og tí verður skotið upp, at landalæra og lívfrøði verða kravdar lærugreinir í 8. og 9. flokki. Hóast søga er kravd lærugrein í framhaldsskúlanum, so tykist tað, sum um henda lærugrein er við skerdan lut, og tí verður skotið upp, at lærugreinin samtíðarkunning/søga fær broytta orðing: søga/samtíð, og við hesum verður eisini givin ábending um broytt innihald.

Ein onnur broyting er, at skotið verður upp, at ítróttur framyvir skal verða vallærugrein í staðin fyri kravd lærugrein sum nú. Sum grundgeving verður víst á, at ítróttur er tað frítíðarítriv, sum í støðugt størri mun savnar størstu barna-, unglinga- og mannfjøld rundan um seg, so sjálvt um henda lærugrein ikki er kravd í framhaldsskúla fólkaskúlans, so er tað tó nógv teir flestu næmingarnir, ið fáa henda fimleik á annan hátt uttan fyri fólkaskúlan, og harumframt verður mett, at óivað fara tað at verða tey allarflestu, ið ynskja at hava ítrótt, sjálvt um hon verður vallærugrein. Sonuleiðis verður hildið rímiligt, at lata teir næmingar, sum av einihvørji orsøk ikki ynskja at hava hesa lærugrein í framhaldsskúlanum, sleppa undan ítrótti.

Í sambandi við vallærugreinirnar verður tann broyting skotin upp, at sundurbýtið millum tilboðs- og sjálvboðslærugreinir verður strikað, bæði tí at royndirnar vísa, at henda raðfesting í lógini als ikki "stýrir lærugreinavali næmingauna" og eisini, tí at lógin ikki eigur at gera tað.

Sambært verandi lóg verður í ávísum lærugreinum givin undirvísing í tveimum skeiðum við ymiskum innihaldi. Skeiðini verða nevnd grundskeið og víðkað skeið. Skotið verður upp at strika hesa skipan, sum helst hevur sítt grundarlag í tí

gamla realskúlanum. Royndirnar hesi árini hava víst, at skipanin hevur ikki virkað væl og hevur havt óhepnar avleiðingar.

Skotið verður eisini upp at taka av ásetanina um, at næmingar í 10. flokki kunnu fáa undirvísing í 5 ymiskum bólkum, ið hava serligt tilknýti til ymisk yrki. Hesi árini hevur at kalla eingin skúli roynt hesa skipan, og eingin tykist hava áhuga fyri hesum. Upprunaliga var helst ætlanin at geva næmingum í 10. flokki veruliga yrkisundirvísing av rættindisgevandi slag, sum kundi stytt nakað um framhaldandi útbúgving teirra. Í álitinum til verandi fólkaskúlalóg varð víst á, at henda ætlan neyvan kann verða framd í verki, uttan so er, "at fingið verður til vega eitt víttfevnandi samarbeiði hæði millum skúlar sínámillum, millum fólkaskúlan og aðrar undirvísingarstovnar og millum skúlarnar og vinnulívið." Royndirnar hava víst, at bert okkurt einstakt dømi er um samarbeiði millum fólkaskúlan og yrkisskúlan. Spurningurin er eisini, um fólkaskúlin skal taka sær av at geva yrkisundirvísing av rættindisgevandi slag. Vit kunnu koma at blanda fólkaskúla og miðnámsútbúgvingar saman, og hetta er ikki í samljóð við nútíðar skúlapolitikk og neyvan nøkur skilagóð loysn, ið allir partar í útbúgvingarverkinum eru sinnaðir at góðkenna.

Í sambandi við royndirnar verður skotið upp, at allar kravdu lærugreinirnar í fólkaskúlanum verða royndarlærugreinir. Men samstundis verður Landsskúlafyrisitingini heimilað at kunna áseta, at nakrar lærugreinir verða tiknar burturúr sum royndarlærugreinir hvørt árið. Við hesi nýggju áseting ber til at minka munandi um sjálvt royndarhaldið, sjálvt um royndarlærugreinirnar verða fleiri í tali enn í galdandi lóg.

Mett verður at broytingarnar, ið her verða skotnar upp, um tær allar verða framdar, ikki samanlagt fara at krevja meirjáttanir, og roknast kann við, at ikki verður neyðugt við so stórari meginumsiting, og eftirlitið verður minni.

Læsiætlanarnevndin og Landsskúlaráðið mæla til at seta broytingarnar í gildi skúlaárið 1993/94.

Landsstýrið hevur viðgjørt henda spurningin og er komið til tað niðurstøðu, at til ber at seta løgtingslógina um broyting í fólkaskúlalógini í gildi frá 1. august 1992, men hinvegin verður ásannað, at nakrar av broytingunum ikki kunnu virka fyr enn frá 1. august 1993.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

Til pkt. 1) (broytingar í § 3, stk. 1):
Stk. 1 og 2 í verandi lóg eru løgd saman, eins og orðingin er broytt. Við hesi broyting verður dentur lagdur á, at 10. flokkur er ein sjálvsagdur partur av fólkaskúlanum. Orðingin í stk. 2 í verandi lóg um, at 10. flokkur "kann røkka um meir

enn eitt skúlaár", er strikað, tí einki er í lógini, ið forðar fyri, at næmingur t. d. kann vera 2 ár í sama flokki, onnur skúlaár eisini.

Til pkt. 2) (broytingar í § 3, stk. 2):
Sambært § 43 í fólkaskúlatógini hava børn 7 ára undirvísingarskyldu, og við tí í § 42 nevnda fyrivarni í huga er illa hugsandi, at næmingum í tí 7 ára grundskúlanum kann verða loyvd skúlagongd aðrastaðni enn í fólkaskúlanum. Men vit hava bert 7 ára undirvísingarskyldu, og framhaldsskúli (8.-10. flokkur) er ikki kravdur, og tí er einki til hindurs fyri, at næmingar fólkaskúlans í framhaldsskúlanum lutvíst kunnu nomið sær fakliga útbúgving á øðrum útbúgvingarstovni; men er talan um, at næmingar fáa alla (í stk. 3 nevnt "heilt") sína undirvísing á øðrum undirvísingarstovni, tá eru teir ikki longur undir lógarheimild fólkaskúlans.

Til pkt. 3) (broytingar í § 3, stk. 3):
Nýtt stk. 3 er orsakað av, at undirvísingarligt samstarv millum framhaldsskúlan og aðrar undirvísingarstovnar kann reisa ymsar spurningar, ið bæði kunnu vera av fíggjarligum, fyrisitingarligum og undirvísingarligum slag. Tí eigur Landsskúlaráðnum at verða heimilað at gera reglur fyri tílíkum samarbeiði.

Til pkt. 4) (broytingar í § 4, stk. 2):
Nýtt stk. 4 har heimilað verður undirvísingarligum samstarvi millum lærugreinir, og er hetta eisini í samsvar við royndarvirksemi í fólkaskúlanum. Undirvísingarliga lærugreinasamstarvið verður avmarkað til tann einstaka flokkin.

Til pkt. 5) (broytingar í § 5):
Broytingar í mun til verandi fólkaskúlalóg:
- lærugreinin samtíðarkunning/søga hevur fingið broytta orðing til søga/samtíð.
- landalæra og lívfrøði verða kravdar lærugreinir í 8. og 9. flokki og
- ítróttur verður ikki kravd lærugrein í 8. og 9. flokki.

Til pkt. 6) (broytingar í § 6, stk. 1):
Stk. 1 og 2 í verandi lóg verða løgd saman, við tað at sundurbýtið í tilboðsgreinir og sjálvboðsgreinir verður strikað, so at talan bert verður um javnsettar vallærugreinir hjá næmingunum at velja ímillum. Valmøguleikarnir kunnu tó vera avmarkaðir vegna vantandi bólkstødd, útbúnað o.ø.

Til pkt. 3 í stk. 1 er tann broyting, at lærugreinirnar fiskivinna og sjómannsskapur verður ein lærugrein: Sjóvinna.

Onnur broyting er, at ítróttur verður vallærugrein.

Til pkt. 7) (§ 7):
§ 7 verður strikað, so skipanin við skeiðbýttari undirvísing í 8. og 9. flokki í ávísum lærugreinum fellur burtur.

Til pkt. 8) (broytingar í § 8):
Ítróttur verður ikki kravd lærugrein í 10. flokki.

Stk. 2: Á sama hátt sum í 8. og 9. flokki verður skipanin við sundurbýti í tilboðs- og sjálvboðslærugreinir strikað. (Víst verður á viðmerkingarnar til § 6, stk. 1).

Til pkt. 9) (broytingar í § 9, stk. 1):
Skipanin í § 9, stk. 1 í verandi lóg við 5 bólkum, ið næmingarnir í 10. flokki kunnu velja, verður strikað. Henda skipan hevur ongantíð verið nýtt, og er hon heldur ikki í samsvar við áskoðanina, at fólkaskúlin eigur at vera almennandi. Nýggja orðingin í stk. 1 ber í sær, at til ber til at geva seinasta flokki í fólkaskúlanum júst tað innihald og tann form, ið best hóskar, og sum kann fremjast í verki í tí einstaka framhaldsskúlanum.

Til pkt. 10) (§ 9, stk. 2):
Verandi stk. 2 verður strikað, við tað at allar vallærugreinirnar eru javnsettar (samanber § 8, stk. 2).

Av tí at skipanin við bólkum í stk. 1 verður strikað, so má stk. 3 eisini strikast.

Ásetingin í stk. 4 er somuleiðis óneyðug, við tað at heimildin til samstarv millum framhaldsskúlan og aðrar undirvísingarstovnar longu er givin í stk. 2 í § 3.

Stk. 5 verður til stk. 2 við teirri broyting, at orðini "§ 22, stk." verður broytt til: "§ 22, stk. 4."

Til pkt. 11) (§10):
Verandi § 10 verður strikað (sí viðmerkingarnar til § 7).

Til pkt. 12) (broytingar í § 12):
Við broyttu orðingini verður dentur lagdur á sjálvt flokslærarahugtakið, og á at ein flokslærari verður settur til hvønn flokk. Eisini verður við hesum latið upp til tann einstaka skúlan at taka støðu til tímanýtsluna.

Til pkt. 13) (broytingar í § 16, stk. 3):
Av tí at skeiðbýtið sambært § 7 og 10 í verandi lóg verður strikað, má eisini skeiðvalið strikast her. Orðingin verður eisini broytt, so tað verða foreldrini og næmingurin, sum í samráð við skúlan taka avgerð um val av lærugreinum og um framhaldandi skúlagongd.

Til pkt. 14) (broytingar í § 17):
Orðingin í verandi lóg um, at fólkaskúlin skal "alt tað er møguligt vera floks-býttur, soleiðis at hvør árgangur verður undirvístur sær", er ikki í samsvar við meginregluna um, at børn í undirvísingarskyldugum aldri eiga at hava rætt at ganga í skúla í heimbygdini, so sum eisini er tilskilað í § 28, stk. 4 og 5, og verður

tí orðingin broytt. Við broyttu orðingini í stk. 2 hevur tann einstaki skúlin betri møguleikar at skipa sína undirvísing innan galdandi tíma- og lærugreinabýti.

Til pkt. 15) (broytingar í § 20, stk. 2):
Broytingin er gjørd sum ein avleiðing av, at skotið er upp at strika bátkarnar í § 9, stk. 1.

Til pkt. 16) (broytingar í § 20, stk. 3):
Broytingin er, at allar tær kravdu lærugreinirnar í fólkaskúlanum verða javnsett ar, við tað at tær nú verða royndarlærugreinir.

Til pkt. 17) (broytingar í § 20, stk. 4)
Stk. 4 er nýtt, og við ásetingini í hesum stk. ber til at minka munandi um sjálvt royndarhaldið, sjálvt um royndarlærugreinirnar verða fleiri í tali enn í galdandi lóg.

Til pkt. 18) (§ 22):
Fyrisitingarliga hevur tað kenst óheppið, at tað árliga talið á skúladøgum ikki hevur verið ásett í lóg ella kunngerð. Tí verður nú árliga talið av skúladøgum sett í lógina.

Til stk. 2: Við hesum verður heimildin hjá Landsskúlaráðnum at skipa árliga talið á frídøgum og frítíðum, og nær summarfrítíðin byrjar, sett í lógini.

Til stk. 3: Her verður ásett hámark fyri dagligu undirvísingartíð næminga í teim ymsu flokkunum.

Til stk. 4: Við ásetingini í § 22, stk. 3 er m. a. neyðugt somuleiðis at áseta eindarhugtakið "undirvísingartími" sum útrokningarmiðal, ið er settur at vera 45 min. Her er at viðmerkja, at hóast tað av praktiskum grundum er neyðugt at nýta undirvísingartímahugtakið, so eigur tað tó sjálvandi at verða møguligt hjá skúlum framhaldandi at býta skúladagin sundur í aðrar undirvísingatímaeindir innan fyri ásettan karm.

Til stk. 5: Stk. 2 í verandi lóg verður við broyttari orðing stk. 5.

Til pkt. 19) (§ 22 a):
Hetta er nýggj grein, og ásetingarnar í hesi grein eru nýggjar í mun til verandi lóg. Her verður næmingunum tryggjað eitt forsvarligt undirvísingartímatal. Við tað at sett verður í lógina eitt lágmark fyri undirvísingartímatali næminganna um vikuna tey fyrstu 7 árini. Fyri ársbýttan skúla er hetta 182 tímar. Við at seta lágmark fyri undirvísingartímatalið í hvørjum flokki sær verður tryggjað, at ikki ov stórur ójavni verður skúlanna millum. Í mun til verandi tímabýti er skotið upp at hækka tímatalið í 1. og 2. flokki, og at lækka tað nakað í teim elstu flokkunum.

Fyri ikki ársbýttar skúlar er eisini ásett lágmark fyri undirvísingartímatalið, og samstundis verður víst á sambandið millum vikutímalágmarkið og skúlastoddina. Heimild er tó undir serligum umstøðum at víkja frá ásetingunum í hesi grein.

Tíma- og lærugreinabýtið er av grundleggjandi týdningi fyri virkseni fólkaskúlans og eigur at koma út sum rundskriv, og tað er tí Landsskúlaráðið, ið hevur tann góðkennandi myndugleikan.

Til pkt. 20) (§ 23):
Fyri trivnað og sosialu vælveru næminga er umráðandi at varðveita flokslingtakið. Tí verða her ásettar meginreglur, tá ið støða skal takast til flokstalið í teimum ymsu skúlunum.

Til stk. 2: Floksdeildtalið 24 verður varðveitt sum vanligur normur, sum tó bæði skúli og Landsskúlafyrisitingin í serstøkum førum hava heimild til at víkja frá.

Stk. 3. Heimilað verður Landsskúlafyrisitingini í serstøkum førum at víkja frá ásetingunum í hesi grein.

Til pkt. 21) (§ 27, stk. 3):
Fólkaskúlin fevnir um børn og ung upp til 18 ár (smb. § 27,1), men royndirnar vísa, at fleiri fólk eldri enn 18 ár ynskja og hava tørv á at ganga í framhaldsdeild fólkaskúlans. Sambært nýggja stk. 3 kunnu skúlamyndugleikar á staðnum tí fáa heimild til at loyva næmingum at fáa undirvísing í fólkaskúlanum, sjálvt um teir eru eldri enn 18 ár.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 129/1991: Broyting í fólkaskúlalógini.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1992 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur havt fund við umboð fyri Føroya Lærarafelag, avvarðandi landsstýrismann, umboð fyri landsskúlafyrisitingina og lesiætlanarnevndina. Í skrivi dgf. 11. apríl 1992 til skúlanevnd løgtingsins hevur Føroya Lærarafelag útgreinað støðu sína til fyriliggjandi lógaruppskot. Eisini er komið skriv dagfest 9. mars 1992 frá nevndini í Giktafelag Føroya um spurningin, um ítróttur skal verða val grein í framhaldsskúlanum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjarni Djurholm, Jógvan A. Johannessen og Mikkjal Sørensen) tekur sum heild undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja hetta við ávísum broytingum. Nevndi meiriluti hevur hesar viðmerkingar:

Í uppskoti landsstýrisins verður mælt til at strika ítrótt sm tvingaða lærugrein í 8., 9. og 10. flokki, og í staðin gera hesa lærugrein til tilboðslærugrein. Hesum

tekur meirilutin ikki undir við og setir tí fram uppskot um, at henda tærugrein eisini framyvir verður tvingað.

Í samband við verkætlanararbeiði og evniskunnandi undirvísing "kann" hetta sambært uppskotinum standa næmingunum í 10. flokki í boði. Fyri at geva flestu næmingum møguleika til hesa undirvísing, mælir meirilutin til at tátta hesa orðing: "kann" til: "eigur at".

Í uppskotinum er longdin av skúlaárinum sett til: "vanliga 200 dagar". Meirilutin er av teirri fatan,at hetta dagatal eigur at verða ásett av landsstýrinum. hetta m.a. av at longdin av skúlaárinum eisini er treytað av samráðingum millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Í § 22, stk. 3, verður rættað í lógaruppskotinum fylgjandi:

2) Í 3. - 4. flokki og í **3)** í 5., 6. og 7. flokki.

Í uppskotium verður mælt til at býta flokkar eftir ávísum meginreglum (§ 23, stk. 1). Meirilutin er av teirri fatan, at tað kann verða torført at síggja fylgjurnar av hesum uppskotinum og mælir tí í hesum umfarinum at strika nevnda § 23, stk. 1.

Harafturat mælir meirilutin til, at § 22a, 1-7 ikki verður sett í gildi fyrrenn 1. august 1993.

Undir nevndararbeiðinum er týðiliga komið til sjónar týdningurin av, at greiðari og betri skipað viðurskifti fáast í samband við fráveru næminganna í framhaldsdeildini. Meirilutin mælir tí til at broyta § 20, stk. 8, í verandi lóg, tí at landsskúlaráðið ásetir reglur um mest loyvdu fráveru, og setir meirilutin tí fram lógaruppskot besum viðvíkjandi.

Sostatt setir nevndi meiriluti fram soljóðandi:

broytingaruppskot

1) § 5 verður orðað soleiðis: "Undirvísingin í 8. og 9. flokki er fyri allar næmingar: føroyskt, danskt, landalæra, lívfrøði, søga/samtíð, kristnikunnleiki, rokning/støddfrøði og ítróttur."	**1)** § 5 affattes således: "Undervisningen i 8. og 9. klasse omfatter for alle elever: færøsk, dansk, engelsk, geografi, biologi, historie/samtid, kristendomskundskab, regning/matematik og idræt."
2) Í § 6, stk. 1 verður pkt. 5 "ítróttur" strikað og pkt. 6, 7 og 8 verða 5, 6 og 7.	**2)** I § 6, stk. 1 udgår pkt. 5 "idræt" og pkt. 6, 7 og 8 bliver 5, 6 og 7.
3) § 8, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Undirvísingin í 10. flokki er fyri allar næmingar: Føroyskt, danskt, samtíð, kristnikunnleiki og ítróttur."	**3)** § 8, stk. 1, formuleres således: "Undervisningen i 10. klasse omfatter for alle elever: Færøsk, dansk, samtid, kristendomskundskab og idræt."

4) Í § 8, stk. 2, gongur út pkt. 4 "ítróttur".

5) § 9, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Næmingum í 10. flokki eigur at standa í boði verkætlanararbeiði og evniskunnandi undirvísing".

6) Í § 20 verður skoytt upp í stk. 8:
"Landsskúlaráiðið ásetur reglur um mest loyvdu fráveru."

7) § 22, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Skúlaárið byrjar 1. august, og landsstýrið ásetir árliga talið av skúladøgum."

8) Í § 22, stk. 3, verður pkt. 2 broytt til "3. - 4. flokki" og pkt. 3 verður "6. og 7." broytt til "5., 6. og 7."

9) Í pkt. 20 viðvíkjandi § 23 gongur stk. 1 út, og stk. 2 verður stk. 1.

10) Í § 23, verður stk. 2, orðað soleiðis:
"Landsskúlaráðið ásetir fyri hvørt skúlaár talið á flokkum við hvønn einstakan skúla. Fyri teir skúlar, ið hava undirvísing út yvir 7. árgang, ásetir landsskúlaráðið á hvørjum ári talið á flokkum í skúlanum grundað á upplýsingar frá skúlunum um næmingatalið, ið ætlast at verða komandi skúlaár. Fyri hinar skúlarnar skal skúlaleiðarin um skúlanevndina taka spurningin um broyting í flokkatalinum upp, um so er, at broytingar verða í væntaða næmingatalinum, og tær kunnu ávirka flokkatalið. Tílíkar frágreiðingar skulu bert sendast inn, um skúlanevndin heldur, at broyting eigur at gerast í flokkatali skúlans."

4) I § 8, stk. 2, udgår pkt. 4 "idræt".

5) § 9, stk. 1, affattes således:
"Undervisningen for elever i 10. klasse bør omfatte projektarbejde og projektorienteret undervisning".

6) I § 20 tilføjes til stk. 8:
"Landsskolerådet fastsætter regler om mest tilladt fravær."

7) § 22, stk. 1, formuleres således:
"Skoleåret begynder den 1. august, og landsstyret fastsætter det årlige antal af skoledage."

8) I § 22 stk. 3, ændres pkt. 2 til "3. og 4. klasse" og pkt. 3: "6. og 7." til "5., 6. og 7.".

9) I pkt. 20 vedrørende § 23 udgår stk. 1, og stk. 2 og bliver stk. 1.

10) I § 23, affattes stk. 2, således:
"Undervisningsrådet fastsætter for hvert skoleår antallet af klasser ved hver enkelt skole. For de skoler, der har undervisning ud over 7. årgang, fastsætter undervisningsrådet hvert år antallet af klasser i skolen på grundlag af indhentede oplysninger om forventet elevtal i det følgende skoleår. For de øvrige skolers vedkommende skal skolelederen gennem skolekommisskonen rejse spørgsmål om ændring i klassetallet, såfremt der sker ændringer i det forventedes elevtal, der kan påvirke antallet af klasser. Sådanne indberetninger skal kun finde sted, når man fra skolekommissionens side er af den opfattelse, at der bør ske ændring i klassetallet ved skolen."

11) Í pkt. 19 - nýggj § 22 a - gongur stk. 5 út.

12) Í pkt. 19 - nýggj § 22 a - verður í stk. 6 "í stk. 1-4", og stk. 6 og 7 verða nú stk. 5 og 6.

13) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Tó fáa § 5, § 6, stk. 1, § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1 og § 20, stk. 3 og 4, og § 22 a, 1-7 gildi frá 1. august 1993."

11) I pkt. 19 - ny § 22 a- udgår stk. 5.

12) I pkt. 19 - ny § 22 a - ændres i stk. 6 "i stk. 1-5" til: "i stk. 1-4", og stk. 6 og 7 liver nu stk. 5 og 6.

13) § 2., stk. 2 affattes således:
"Dog træder § 5. § 6, stk. 1, § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 1, og § 20, stk. 3 og 4 og § 22 a, 1-7 i kraft 1. august 93."

Annars vísir meirilutin til álitið í løgtingsmáli nr. 3/1991: Miðnámsútbúgvingar, har álagt verður landsstýrinum "at kanna um støðisárið, sum er ætlað sum grundarlag fyri flestu miðnámsútbúgvingar, kann verða partur av verandi fólkaskúlaskipan í 10. flokki.

Støðisárið eigur at leggja dent á tvørfakliga samstarvið og harvið eisini alment mennandi partin.

Nevndin leggur dent á, at landsstýrið eigur at fáa staðfest, um henda loysn er í tráð við § 9 í fólkaskúlalógini. Nevndin ger vart við, at helst eru hølir og lærarakreftir tøk til endamálið. Hesum eigur landsstýrið at fáa greiðu á."

Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna, um støðisárið, sum er ætlað sum grundarlag fyri flestu miðnámsútbúgvingar, kann verða partur av verandi fólkaskúlaskipan í 10. flokki.

Minnilutin (Terje Davidsen og Signar Hansen) førir fram:

Tá galdandi fólkaskúlalóg varð viðgjørd í tinginum í 1978, legði løgtingsins skúlanevnd stóran dent á at geva málinum eina so góða og gjølla viðgerð sum gjørligt. Hetta eydnaðist, skúlanevndin legði fram.

Sitandi landsstýri mælir løgtinginum til at gera ávísar broytingar til galdandi fólkaskúlalóg. Eftir minnilutans fatan er høvuðsorsøkin til uppskotnu broytingar tær, at landsstýrið skal hava betri møguleikar at skerja játtanina til fólkaskúlan. Millum annað skal verða nevnt, at orðingin um hægst loyvda næmingatal í hvørjum flokki mælir landsstýrið til at strika. Fimleikurin, sum hevur verð tvungin lærugrein í fólkaskúlanum, mælir landsstýrið til at gera til vallærugrein. Somuleiðis skjýtur landsstýrið upp, at skeiðsbýtini í ávísum lærugreinum verður avtikið. Tað er eyðsæð, at verða nevndu broytingar framdar, so gerst raksturin av fólkaskúlanum bíligari, men avleiðingarnar verða, at vit fáa ein verri fólkaskúla.

Undir fyrstu viðgerð á tingi og undir nevndarviðgerðini er komið fram, at tingmenn yvirhøvur mæla frá, at lógin kemur í gildi í komandi skúlaári. Minnilutin dugir illa at skilja, hví meirilutin í løgtingsins skúlanevnd skal skunda eitt tílíkt stórmál ígjøgnum, í staðin fyri at taka undir við, at løgtingsins skúlanevnd verður gjørd til millumtinganevnd, ið hevur møguleika fyri at geva málinum eina góða og gjølla viðgerð, og so leggja álitið fram tíðliga í ólavsøkutingsetuni, so lesiaetalnarnevndin hevur góða tíð at fyritreika sítt arbeiði, í samband við tær broytingar, ið verða samtyktar.

Minnilutin mælir løgtinginum til at samtykkja, at løgtingsins skúlanevnd verður gjørt til eina millumtinganevnd, ið leggur álit fram í málinum tíðliga í ólavsøkutingsetuni.Vísandi til tað, ið er borið fram í hesum áliti, setir minniutin soljóðandi uppskot til samtyktar fram:

Uppskot

til

samtyktar

Í samband við løgtingsmál nr. 129/1991: Broyting í fólkaskúlalógini verður løgtingsins skúlanevnd gjørd til millumtinganevd.Nevndin skal verða liðug við arbeiðið sítt tíðliga í komandi ólavsøkutingsetu.

130. Løgtingslóg um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons (BRT/GT)

Uppskot

til

Løgtingslóg um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons (BRT/GT).

§ 1.

Lógin fevnir um bjargingarútgerð, sum skal vera um borð á førum.

Stk. 2. Útgerð, sum umframt er kravd av Skipaeftirlitinum, skal eisini vera um borð.

Lagtingslov om redningsudstyr i åbne både og fartøjer under 20 tons (BRT/GT).

§ 1.

Loven omfatter redningsudstyr, som skal være om bord på fartøjer.

Stk. 2. Udstyr, som er yderligere på krævet af Søfartsstyrelsen, skal ligeledes være om bord.

§ 2.

Á opnum bátum frá áttamannafari (24 fót/7,44 m) og uppeftir og deksførum undir 20 tons (BRT/GT), skal henda útgerð vera um borð, tá ið lagt verður frá landi:

1) Kumpass, sum á deksførum skal vera føst uppsett.
2) Floyta, tó soleiðis, at um báturin er styttri enn 12 m, floyta ella blásilúður.
3) Mastur, segl, árar og bátshaki har hetta er verkliga gjørligt.
4) Eldsløkkjari, 6 kg pulvur.
5) Minst 2 pøsir.
6) 3 neyðrakettir og 3 neyðbluss og lummalykt.
7) Varp við flatogi.
8) Bjargingarbelti, -vestur ella yvirlivilsisdrakt til hvønn persón.
9) Neyðsendari av VHF slagi, ikki berbarur, men fastgjørdur um borð.
10) Siglingarljós.
11) Radarreflektor.
12) Skipsskjøl, vegleiðingar og uppsløg, sum eru kravd. Skrokksertifikat, bert fyri glastrevjabátar. Føroyskur álmanakki og sjókort yvir sigliøki.
13) Neyðugir cykalutir til motorin.
14) Bjargingarkransur við línu, sum er 27,5 m.

§ 2.

I åbne både fra ottemandsfarer (24 fod/7,44 m) og opefter og dæksfartøjer under 20 tons (BRT/GT), skal følgende udrustning være om bord ved afrejse:

1) Kompas, som på dæksfartøjer skal være fast opstillet.
2) Fløjte, dog således at hvis båden er mindre end 12 m, fløjte eller blæsehorn.
3) Mast, sejl og bådshage hvor dette er praktisk muligt.
4) Ildslukker, 6 kg pulver.
5) Mindst 2 spande.
6) 3 nødraketter og 3 nødblus og lommelygte.
7) Varp med line.
8) Redningsbælte, -vest eller overlevelsesdragt til hver person.
9) Nødsender af VHF-art, ikke bærbar, men fastgjort om bord.
10) Navigationslys.
11) Radarreflektor.
12) Skibscertifikater, vejledninger og opslag, som er påkrævet. Skrogcertifikat, kun til glasfiberbåde. Færøsk almanak og søkort over fartsområdet.
13) Nødvendige reservedele til motoren.
14) Redningskrans med line, som er 27,5 cm.

§ 3.

Bátar minni enn áttamannafar (24 fót/7,44 m) skulu hava hesa útgerð:

1) Kumpass.
2) Blásilúður ella floytu.

§ 3.

Både mindre end ottemandsfarer (24 fod/7,44 m) skal være udrustet med følgende redningsudstyr:

1) Kompas.
2) Blæsehorn eller fløjte.

3) Mastur, segl, árar og bátshaka har hetta er verkliga gjørligt.
4) Føroyskan álmanakka.
5) Pøs.
6) Bjargingarbelti ella -vest til hvønn persón.
7) Neyðrakett ella neyðbluss og lummalykt.
8) Varp við flatogi.
9) Radarreflektor.

§ 4.

Bátar undir 20 fót (6,20 m) koma ikki undir reglurnar í 2 og 3 í hesi lóg, tó skal vera eitt bjargingarbelti ella bjargingarvestur fyri hvønn persón um borð.

§ 5.

Før, sum verða nýtt til ferðafólkaflutning, skulu hava útgerð sum ásett í reglunum hjá Skipaeftirlitinum.

§ 6.

Vaktar- og bjargingartænastan hevur eftirlit við, at lógin verður hildin, og hevur rætt til uttan rættarúrskurð at fara umborð á før at gera neyðugar kanningar.

Stk. 2. Vaktar- og bjargingartænastan kann í serligum føri loyva frávik frá minstakravinum um bjargingarbelti ella bjargingarvest, tá hetta ikki er til ampa fyri tryggleikan um borð.

§ 7.

Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur um nýtslu og burturbeining av bjargingarútgerð og um keyp og sølu av slíkari útgerð.

3) Mast og sejl, hvor dette er praktisk muligt.
4) Færøsk almanak
5) Spand.
6) Redningsbælte eller -vest til hver person.
7) Nødraket eller nødblus og lommelygte.
8) Varp med line.
9) Radarreflektor

§ 4.

Både under 20 fod (6,20 m) kommer ikke under reglerne i 2 og 3 i denne lov, dog skal der forefindes et redningsbælte eller redningsvest til hver enkelt person om bord.

§ 5.

Fartøjer, som anvendes til befordring af passagerer, skal være udstyret i henhold til bestemmelserne fastsat af Søfartsstyrelsen.

§ 6.

Vagt- og Bjærgningstjenesten fører tilsyn med, at loven overholdes, og har ret til uden retskendelse at gå om bord i fartøjer for at foretage fornødne undersøgelser.

Stk. 2. Vagt- og bjærgningstjenesten kan i særlige tilfælde fravige mindstekravet om redningsbælte eller redningsvest, når dette ikke er til hinder for sikkerheden om bord.

§ 7.

Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler om brugen og bortskaffelse af redningsudstyr og om køb og salg af sådant udstyr.

Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur um bjargingarútgerð á førum, sum ikki koma undir reglur ásettar av Skipaeftirlitinum.

§ 8.

Brot á hesa lóg og reglur settar í gildi við heimild í lógini verða revsað við bót.

§ 9.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 38 frá 29. mai 1985 um bjargingarútgerð á opnum bátum.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere bestemmelse om bjærgningsudstyr i fartøjer, som ikke er omfattet af Søfartsstyrelsens bestemmelser.

§ 8.

Overtrædelse af denne lov og bestemmelser i medfør af loven straffes med bøde.

§ 9.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 38 af 29. maj 1985 om redningsudstyr i åbne både

Viðmerkingar:

Vaktar- og bjargingartænastan hevur biðið landsstýrið um at fremja broytingar í lógini um bjargingarútgerð frá 1985, soleiðis at reglurnar verða meira greiðar. Skipaeftirlitið hevur somuleiðis víst á, at greiða má fáast á teimum fløkta viðurskiftunum, nær bátar og før eru undir reglunum sambært løgtingslógini frá 1985 ella undir teirra arbeiðsøki.

Landsstýrið og Søfartsstyrelsen hava í samstarvssáttmála sínamillum funnið fram til eina skipan, har V & B hevur eftirlitið við øllum førum undir 20 tons á sjónum, meðan skipaeftirlitið hevur harumframt eftirlit við teimum førum, sum koma undir sýn.

ad. § 1:

Samsvar er ímillum lógaruppskotið og "Søfartsstyrelsens Meddelelse F" uttan í serligum føri, har Skipaeftirlitið hevur serkrøv.

ad. § 2:

Innihaldið samsvarar reglunum hjá Skipaeftirlitinum upp til 20 tons BRT ella GT. Spurningurin um fastan VHF er viðgjørdur í samráð við teleeftirlitið og við atliti til hoyriviðurskiftini á VHF.

Skrokksertifikat til glastrevjabátar kann bert verða givið av góðkendum virkjum.

ad. § 3:

Óbroytt frá verandi lóg.

ad. § 4:
Sum minstakrav skal vera eitt bjargingarbelti ella -vestur til hvønn um borð.

ad. § 5:
Før til serlig endamál skulu góðkennast og hava útgerð sambært krøvum Skipaeftirlitsins.

ad. § 6:
V & B fær alt eftirlitið undir 20 tons. V & B fær í uppskotinum somuleiðis heimild at gera frávik sum til dømis, tá kappróður fer fram.

ad. § 7:
Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur í kunngerð fyri lógarøkið.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 130/1991: Løgtingslóg um bjargingarútgerð á opnum bátum og á førum undir 20 tons (BRT/GT).

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men heldur tó, tá ið hugsað verður um tær vanlukkur, sum henda bæði á skipum og bátum við tað, at persónar detta fyri borð og drukna, so eigur at verða arbeitt við at finna fram til belti ella líkmandi, sum heldur persónum flótandi, og sum er soleiðis háttað, at til ber at hava tað á likaminum uttan at tað er til ampa fyri at inna tað arbeiði, sum skal gerast.

Nevndin heldur at arbeiti kann verða við møguleikum fyri at áleggja fráboðanarskyldu fyri før undir 20 BRT tons. Her verður serliga hugsa um útróðrarbátar við einum manni umborð.

Ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

131. Løgtingslóg um húsarhaldsskúlar

Uppskot

til

Løgtingslóg um húsarhaldsskúlar.

1. Kapittul
Endamál og almennar ásetingar.

§ 1.

Húsarhaldsskúlar eru skúlar, sum geva eina almennandi undirvísing við serligum atliti til heimið og familjuna. Einstakar lærugreinir ella lærugreinabólkar kunnu takast inn í undirvísingina. Húsarhaldsskúlar eru ikki prógtøkuskúlar.

Stk. 2. Landsskúlaráðið skal góðkenna undirvísingarætlanirnar fyri tey vanligu skeiðini.

Stk. 3. Føroya Landsstýri kann góðkenna, at ein húsarhaldsskúli fer undir útbúgvingar, ið viðvíkja húsligum arbeiði.

Stk. 4. Føroya Landsstýri ásetir reglur um upptøkukrøv og fráfaringarroyndir fyri onnur útbúgvingarskeið, sum skúlin stílar fyri.

§ 2.

Skúlarnir eru vistarskúlar, men eisini næmingar, sum ikki búgva á skúlanum, kunnu ganga á skúlanum.

§ 3.

Tá ið eitt góðkent húsarhaldsskeið er lokið, fáa næmingarnir váttan fyri at hava luttikið á skeiðinum. Landsskúlafyrisitingin ger av, hvussu váttanin skal síggja út.

Lagtingslov om husholdningsskoler.

Kapitel 1.
Formål og almindelige bestemmelser.

§ 1.

Husholdningsskoler er skoler, som skal give en almendannende undervisning med særligt henblik på hjem og familie. Enkelte fag eller faggrupper kan få plads i undervisningen. Husholdningsskoler er ikke eksamensskoler.

Stk. 2. Undervisningsrådet skal godkende undervisningsplanerne for de almindelige kurser.

Stk. 3. Færøernes Landsstyre kan godkende, at en husholdningsskole påbegynder uddannelser, som har relation til husligt arbejde.

Stk. 4. Færøernes Landsstyre fastsætter regler om krav til optagelser og afgangsprøver for andre uddannelseskurser, som skolen forestår.

§ 2.

Skolerne er kostskoler, men også elever, som ikke bor på skolen, kan optages.

§ 3.

Når et godkendt husholdningskursus er afsluttet, får eleverne et bevis for at have deltaget på kurset. Undervisningsdirektoratet bestemmer bevisets form og indhold.

2. kapittul
Góðkenning og eftirlit

§ 4.

Føroya Landsstýri kann góðkenna, at ein húsarhaldsskúli, sum lýkur krøvini smb. 1. kapittli, verður settur á stovn. Góðkenningin er treytað av:

1. at skúlin er ein sjálvsognarstovnur við viðtøkum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent,
2. at fyristøðufólkið og føstu lærarar skúlans eru sett av Landsskúlaráðnum eftir tilmæli frá nevnd skúlans,
3. at skúlin er í egnaðum hølum og hevur neyðugt innbúgv og útbúnað,
4. at undirvísingarætlanin er góðkend av Landsskúlaráðnum.

Stk. 2. Landsskúlafyrisitingin hevur umsjón við skúlanum.

§ 5.

Føroya Landsstýri kann taka góðkenningina aftur, um skúlin ikki longur lýkur krøvini í § 4. Landsstýrið kann eisini taka góðkenningina aftur, um undirvísingin ella onnur viðurskifti ganga ímóti teimum vanligu stevnumiðunum, sum eru fyri tílíkar skúlar, ella um landsstýrið ikki longur heldur tørv verða á skúlanum.

Stk. 2. Góðkenningin smb. stk. 1 kann bert verða tikin aftur eftir samráðing við nevndina í sjálvsognarstovninum.

Stk. 3. Føroya Landsstýri kann sýta fyri, at skúlin verður avtikin, um mett verður, at tørvur framvegis er á skúlanum og kann seta reglurnar fyri framhaldandi virki skúlans.

Kapitel 2.
Godkendelse og tilsyn.

§ 4.

Færøernes Landsstyre kan godkende at en husholdningsskole, som opfylder betingelserne i kap. 1, oprettes. Godkendelsen er betinget af:

1. at skolen er en selvejende institution, hvis vedtægter er godkendt af Undervisningsrådet,
2. at skolens forstander og faste lærere er ansat af Undervisningsrådet efter indstilling fra skolens bestyrelse,
3. at skolen er i egnede lokaler og har det fornødne inventar og udstyr,
4. at undervisningsplanen er godkendt af Undervisningsrådet.

Stk. 2. Undervisningsdirektoratet har tilsyn med skolen.

§ 5.

Færøernes Landsstyre kan tilbagekalde godkendelsen, hvis skolen ikke længere opfylder betingelserne i § 4. Landsstyret kan også tilbagekalde godkendelsen, hvis undervisningen eller andre forhold går imod de almindelige retningslinier, som er for sådanne skoler, eller hvis Færøernes Landsstyre finder, at der ikke længere er behov for skolen.

Stk. 2. Godkendelsen, jfr. stk. 1, kan kun tilbagekaldes efter forhandling med den selvejende institutions bestyrelse.

Stk. 3. Færøernes Landsstyre kan nægte, at skolen nedlægges, hvis det skønnes, at der stadig er behov for skolen og kan fastsætte regler for skolens fortsatte virksomhed.

Stk. 4. Verður skúlin avtikin, skulu ognarvirði skúlans nýtast til undirvísingar- og útbúgvingarendamál, sum natúrliga hoyra til málsøki skúlans.

3. kapittul
Skúlans leiðsla

§ 6.

Skúlin er undir eftirliti av eini 5-mannanevnd, hvørs limir verða valdir eftir viðtøkunum fyri stovnin. Ein lærari og ein næmingur umboða skúlan á nevndarfundum, tó uttan atkvøðurætt.

Stk. 2. Fyristøðufólkið er avgreiðslustjóri hjá nevndini og luttekur á øllum nevndarfundum, men hevur ikki atkvøðurætt. Landsskúlafyrisitingin skal hava fundarboð, og umboð fyri Landsskúlafyrisitingina kann luttaka á øllum nevndarfundum, tó uttan atkvøðurætt.

Stk. 3. Verða broytingar gjørdar í nevndini, skal Landsskúlafyrisitingin hava boð um hetta alt fyri eitt.

Stk. 4. Landsstýrið kann góðkenna, at aðrir, enn teir í viðtøkunum nevndu stovnar, velja umboð til nevndina, tó má talið av nevndarlimum ongantíð verða færri enn 5.

Uppgávur og ábyrgd hjá nevndini.

§ 7.

Nevndin hevur tað fyrisitingarliga og fíggjarliga eftirlitið við skúlanum.

Stk. 2. Roknskaparárið er fíggjarárið. Við endan av fíggjarárinum skal nevndin saman við fyristøðufólkinum gera roknskapin og fíggjarstøðuna upp. Rokn-

Stk. 4. I tilfælde af skolens ophør skal dens formue anvendes til undervisning og uddannelse med naturlig relation til skolens formål.

Kapitel 3.
Skolens ledelse

§ 6.

Skolen er under tilsyn af en bestyrelse på 5 medlemmer, som vælges i henhold til institutionens vedtægter. En lærer og en elev repræsenterer skolen på bestyrelsesmøderne, dog uden stemmeret.

Stk. 2. Forstanderen er bestyrelsens forretningsfører og tager del i alle bestyrelsesmøder, men har ikke stemmeret. Undervisningsdirektoratet skal indkaldes til møderne, og en repræsentant for undervisningsdirektoratet kan deltage i alle bestyrelsesmøder, dog uden stemmeret.

Stk. 3. Ændringer i bestyrelsens sammensætning skal omgående meddeles Undervisningsdirektoratet.

Stk. 4. Færøernes Landsstyre kan godkende, at andre, end de i vedtægterne omtalte institutioner, vælger repræsentanter til bestyrelsen, dog må antallet af bestyrelsesmedlemmer aldrig blive mindre end 5.

Bestyrelsens opgaver og ansvar.

§ 7.

Bestyrelsen har det administrative og økonomiske tilsyn med skolen.

Stk. 2. Regnskabsåret er finansåret. Ved finansårets slutning skal bestyrelsen sammen med forstanderen afslutte regnskabet og opgøre status. Regnskab-

skapurin skal verða undirskrivaður av nevndini og fyristøðufólkinum.

Stk. 3. Roknskapurin, sum skal verða grannskoðaður av ríkisviðurkendum grannskoðara, skal verða Landsskúlafyrisitingini í hendi í seinasta lagi 1. mars á hvørjum ári.

Stk. 4. Nevndin ger í samráð við fyristøðufólkið ta árligu arbeiðsskránna og fíggjaretlanina fyri skúlan. Fíggjaretlanin skal verða Landsskúlafyrisitingini í hendi í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári. Arbeiðsskráin skal verða Landsskúlafyrisitingini í hendi í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári.

§ 8.

Nevndin hevur undir ábyrgd Landsskúlafyrisitingarinnar eftirlit við, at skúlin verður fyrisitin eftir lógum, viðtøkum og kunngerðum, og hon hevur ábyrgdina av, at landskassans stuðul til skúlan verður nýttur á rættan hátt.

Stk. 2. Ger nevndin ikki eftir boðum frá Landsskúlafyrisitingini og rættar nærri tilskilað viðurskifti, kann landsstýrið gera av:

1) at uppgávurnar hjá nevndini ella partar av uppgávunum verða røktar av fólki, sum Landsskúlafyrisitingin velur,
2) at nevndin leggur frá sær, og nýggj nevnd verður vald eftir reglunum í viðtøkum skúlans.

Fyristøðufólk og lærarar.

§ 9.

Tann, ið skal røkja undirvísingina á einum húsarhaldsskúla, skal vera útbúgvin húsarhaldslærari frá einum góð-

et underskrives af bestyrelsen og forstanderen.

Stk. 3. Årsregnskabet, som skal revideres af en statsautoriseret revisor, skal være Undervisningsdirektoratet i hænde senest 1. marts hvert år.

Stk. 4. Bestyrelsen udfærdiger i samråd med forstanderen skolens årlige undervisningsplan og budget. Budgettet skal være Undervisningsdirektoratet i hænde senest 1. februar hvert år. Undervisningsplanen skal være Undervisningsdirektoratet i hænde senest 1. december hvert år.

§ 8.

Bestyrelsen fører under ansvar over for Undervisningsdirektoratet tilsyn med, at skolen administreres efter loven, vedtægterne og bekendtgørelser, og den er ansvarlig for, at landskassens tilskud til skolen anvendes forsvarligt.

Stk. 2. Efterkommer bestyrelsen ikke Undervisningsdirektoratets påbud om at rette nærmere angivne forhold, kan Færøernes Landsstyre beslutte:

1) at bestyrelsens opgaver helt eller delvis overtages af personer, som Undervisningsdirektoratet udpeger,
2) at bestyrelsen træder tilbage, og ny bestyrelse vælges efter reglerne i skolens vedtægter.

Forstander og lærere.

§ 9.

Den, som skal bestride undervisningen på en husholdningsskole, skal være uddannet husholdningslærer fra et aner-

kendum norðurlendskum húsarhaldslæraraskúla, ella hava eina útbúgving, sum bæði fakliga og námsfrøðiliga er at javnmeta við hesa útbúgving.

Stk. 2. Tímalærarar verða settir at røkja undirvísingina í lærugreinum/-evnum, sum krevja serútbúgvin fólk.

§ 10.

Til at hava dagligu fyrisitingarligu og undirvísingarligu leiðsluna um hendi verður sett eitt fyristøðufólk. Fyristøðufólkið skal í minsta lagi hava eina útbúgving, sum svarar til krøvini í § 9, stk. 1. Fyristøðufólkið skal síggja til:

1) at undirvísingin samsvarar við undirvísingarætlanina,
2) at undirvísingarumstøðurnar eru fullgóðar,
3) at fíggjarjáttanin til skúlan verður hildin.

Stk. 2. Fyristøðufólkið ger saman við lærarum skúlans uppskot um arbeiðsskrá fyri skúlans virki í komandi ári at leggja fyri nevndina.

Stk. 3. Fyristøðufólkið setir og loysir úr starvi tímalærarar skúlans. Landsskúlafyrisitingin ger reglur viðvíkjandi setan av tímalærarum.

4. kapittul
Stuðul og studningur

§ 11.

Stuðul verður veittur góðkendum skúlum eftir hesum reglum:

1) Til keyp av húsum ella til bygging ella umbygging av húsum til hú sar-

kendt husholdningsseminarium i et af de nordiske lande, eller have gennemgået en uddannelse, som både fagligt og pædagogisk kan sidestilles med omtalte uddannelse.

Stk. 2. Timelærere ansættes som undervisere i fag/emner, der kræver personer med speciafuddannelse.

§ 10.

Til varetagelse af den daglige administrative og undervisningsmæssige ledelse ansættes en forstander. Forstanderen skal have gennemgået en uddannelse, som mindst svarer til kravene i § 9, stk. 1. Forstanderen skal påse:

1) at undervisningen er i overensstemmelse med undervisningsplanen,
2) at de undervisningsmæssige forhold er forsvarlige,
3) at skolens bevilling overholdes.

Stk. 2. Forstanderen udarbejder sammen med skolens lærere forslag til skolens undervisningsprogram for kommende undervisningsår, som skal forelægges bestyrelsen.

Stk. 3. Forstanderen ansætter og afskediger skolens timelærere. Undervisningsdirektoratet udarbejder regler for ansættelse af timelærere.

Kapitel 4.
Støtte og tilskud.

§ 11.

Godkendte skoler tildeles tilskud efter følgende regler:

1) Til køb af bygninger eller til opførelse eller ombygning af bygninger

haldsskúla verða, eftir landsstýrisins góðkenning, sum rentu- og avdráttarfrí lán latin 50% úr landskassanum og 25% av kommununi, har skúlin er.

2) Til keyp av innbúgvi og undirvísingaramboðum verða latin 50% av kostnaðinum úr landskassanum, smb. reglugerð.
3) Lønin til fyristøðufólkið verður goldin úr landskassanum.
4) Fær skúlin eina eftirlønartrygging, verður studningur latin úr landskassanum eftir nærri settum reglum, sum landsstýrið fyriskipar.
5) Landskassin rindar 70% av øllum øðrum góðkendum rakstrarútreiðslum, heruppií útreiðslur til læraralønir, ljós, hita, leigu, umvæling av húsum, rentur, trygging o.s.fr., tó ikki útreiðslur til matvørur og annað tílíkt undirvísingartilfar.

Stk. 2. Treytin fyri studli úr landskassanum er:

1) at skúlin í hvørjum fíggjarári gjøgnumførir minst eitt 20 viku langt góðkent skeið,
2) at skúlin í viðkomandi fíggjarári hevur havt minst 12 ársnæmingar. Bert næmingar, sum hava verið á skúlanum í meira enn 1 undirvísingarviku, verða taldir við í ársnæmingatalið. Bert næmingar, sum hava aldur at fáa almennan studul, verða roknaðir upp í ársnæmingatalið.
3) fyristøðufólkið og læratar skúlans verða løntir eftir reglum, sum landsstýrið setur.

til husholdningsskoler ydes, i henhold til godkendelse fra Føroya Landsstýri, som rente og afdragsfrit lån 50% fra landskassen og 25% fra den kommune, i hvis distrikt pågældende skole ligger.

2) Til køb af inventar og undervisningsmateriale yder landskassen 50% efter nærmere angivne regler.
3) Forstanderens løn betales af landskassen.
4) Opnår skolen en pensionsordning, yder landskassen tilskud hertil efter nærmere af Føroya Landsstýri angivne regler.
5) Landskassen yder 70% af alle godkendte driftsudgifter, heriblandt udgifter til lærerlønninger, el, varme, husleje, vedligeholdelse af bygninger, renter, forsikring o.s.v., dog ikke udgifter til madvarer og lignende undervisningsmateriale.

Stk. 2. Tilskud fra landskassen er betinget af:

1) at skolen hvert finansår gennemfører mindst ét godkendt kursus af 20 ugers varighed,
2) at skolen i vedkommende finansår har haft mindst 12 årselever. Kun elever, som har været på skolen i mer end én undervisningsuge, medregnes i antallet af årselever. Kun elever, hvis alder berettiger opnåelse af elevstøtte, medregnes i årselevtallet,
3) forstanderen og skolens lærere aflønnes efter regler, som fastsættes af landsstyret.

Stk. 3. Lýkur skúlin ikki hesar treytir, kann landsstýrið taka studningin burtur ella lækka hann í mun til skúlans virkseni.

5. kapittul
Næmingastudningur

§ 12.

Næmingarnir gjalda fyri húsarhaldsskeiðið. Landsstýrið ger reglur viðvíkjandi næmingagjaldinum og skal til eina og hvørja tíð góðkenna gjaldsupphæddina.

Stk. 2. Næmingunum verður veittur stuðul smb. reglum ásettum av landsstýrinum.

Stk. 3. Treytin fyri at næmingarnir fáa stuðul til eitt skeið á einum húsarhaldsskúla er, at teir við skeiðsbyrjan hava fylt 16 ár.

Stk. 4. Landsstýrið kann víkja frá reglunum í stk. 3.

6. kapittul
Eftirútbúgving

§ 13.

Føroya Landsstýri kann gera av, um almennur stuðul verður veittur fyristøðufólki og lærarum skúlans í sambandi við eftirútbúgving.

§ 14.

Landsstýrið kann áseta reglur um, at skúlastjórin ella føstu lærarar skúlans fáa farloyvi við løn í sambandi við eftirútbúgving.

Stk. 3. Opfylder skolen ikke disse betingelser, kan landsstyret lade støtten bortfalde eller nedsætte den i forhold til skolens aktivitet.

Kapitel 5.
Elevstøtte

§ 12.

Eleverne betaler for kursus på husholdningsskole. Landsstyret udfærdiger bestemmelser om elevbetalingen og skal til enhver tid godkende beløbsstørrelsen.

Stk. 2. Eleverne modtager støtte i henhold til regler fastsat af landsstyret.

Stk. 3. Betingelsen for at eleverne opnår støtte til et kursus på husholdningsskole er, at de ved kursets begyndelse er fyldt 16 år.

Stk. 4. Landsstyret kan fravige reglerne i stk. 3.

Kapitel 6.
Efteruddannelse

§ 13.

Færøernes Landsstyre kan træffe bestemmelse om tilskud til skolens forstander og lærere i forbindelse med efteruddannelse.

§ 14.

Landsstyret kan fastsætte regler om, at skolens forstander eller faste lærere opnår orlov i forbindelse med efteruddannelsen.

7. kapittul
Royndarvirksemi

§ 15.

Landsskúlaráðið kann víkja frá reglunum í lógini í tann mun hetta er neyðugt fyri at fremja royndarvirksemi innanfyri lógarinnar karmar.

Stk. 2. Landsstýrið kann gera av, at almennur stuðul verður givin til royndarvirksemi innan lógarinnar karmar.

8. kapittul
Gildisreglur o. a.

§ 16.

Lógin fær gildi 1. juli 1992. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 47 frá 9. mai 1976 um stuðul til húsarhaldsskúlar.

Stk. 2. Landsstýrið ásetir í kunngerð, nær § 4, stk. 1, nr. 1) fær gildi.

Kapitel 7.
Forsøgsvirksomhed

§ 15.

Undervisningsrådet kan fravige lovens bestemmelser i det omfang, dette skønnes nødvendigt for at fremme forsøgsvirksomhed inden for lovens rammer.

Stk. 2. Føroya Landsstýri kan træffe bestemmelse om, at landskassen yder tilskud til forsøgsvirksomhed inden for lovens rammer.

Kapitel 8.
Ikrafttrædelsesbestemmelser m. v.

§ 16.

Loven træder i kraft 1. juli 1992. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 47 af 9. maj 1976 om støtte til husholdningsskoler.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse, hvornår § 4, stk. 1, nr. 1) træder i kraft.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 47 um stuðul til húsarhaldsskúlar varð sett í gildi 9. mai 1976. Samanbert hesi lóg verður stuðul veittur til skúlar, sum verða riknir í samsvari við endamálsorðingina í lógini treytað av, at landsstýrið, løgtingsins fíggjarnevnd og avvarðandi kommuna góðkenna, at skúlin verður settur á stovn. Húsarhaldsskúli Føroya, sum byrjaði virksemi sítt í 1974, fær stuðul eftir lógini. 1. august 1991 er kunngerð nr. 80 um stuðul til næmingar, sum ganga á Húsarhaldsskúla Føroya, lýst.

Sum lógin er orðað, eru eingi almenn krøv sett til góðkenningina av einum húsarhaldsskúla, og merkir hetta, at landsstýrið í hvørjum einstøkum føri skal gera av, hvørji krøv skulu setast til húsarhaldsskúlar, fyri at teir kunnu verða góðkendir. Mælt verður til at broyta lógina soleiðis, at hon inniheldur ítøkiligar reglur um m. a. stevnumið skúlans, upptøkutreytir, skeiðslongdir o. a.

Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting, kap. 6, § 27, stk. 1 og 2 er ásett, at Landsskúlaráðið skal góðkenna privatar skúlar, at Landsskúla-

fyrisitingin skal ávísa studningin til hesar skúlar eftir reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, og at leiðsla skúlans skal tryggja, at skúlin fylgir teim virkisreglum, sum settar eru í lógini. Samtaert fyrisitingarlógini verður tað sostatt Landsskúlaráðið, sum skal gera av, hvørji krøv skulu setast til húsarhaldsskúlar, fyri at teir skulu kunna góðkennast.

Útreiðslurnar í sambandi við nýggju lógina um húsarhaldsskúlar eru ásettar í § 11. Samanbera vit § 11 í hesum lógaruppskoti við § 2 í galdandi lóg um stuðul til húsarhaldsskúlar frá 9. mai 1976, sæst, at nýggja lógin ikki áleggur tí almenna størri útreiðslu til undirvísingarliga virksemið, um hetta verður á sama stoði sum nú. Einasti munurin er, at nú verða í stk. 2 settar ávísar treytir fyri stuðlinum.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:

Til § 1, stk. 1:

Næmingar, sum søkja inn á ein húsarhaldsskúla, eiga at fáa høvi til at kunna seg við lærugreinir, sum teir ikki hava havt í fólkaskúlanum, ella sum teir vilja gera meira burturúr. Eisini skulu møguleikar vera til, saman við teim vanligu lærugreinunum á skúlanum at fyrireika seg til eina víðari útbúgving. Sum dømi um aðrar lærugreinir kann nevnast: alís- og evnafrøði, lívfrøði, rokning, føroyskt, fremmant mál og samfelagslæra. Í hesum sambandi er vert at nevna, at neyðugt verður at hava gott samstarv við skúlarnar á staðnum. Á váttanini fyri luttøku á skeiðinum kunnu standa tær lærugreinir, sum næmingurin moguliga hevur lisið, meðan hann var á skeiðinum.

Til § 1, stk. 2:

Ein húsarhaldsskúli eigur at kunna taka á seg útbúgvingar, sum náttúrliga hoyra heima á slíkum skúla, um fíggjarligar umstøður og næmingagrundarlag eru til staðar. Í sambandi við ætlanina at víðka útboðið av miðnámsútbúgvingum til eisini at fevna um matvøruútbúgvingar, vil ein húsarhaldsskúla vera ein náttúrligur liður í útbúgvingini av køksleiðarum og køksstøðingum (kokkenassistenter). Henda útbúgving fevnir um ein praktiskan part og ein ástøðiligan part. Tann ástøðiligi parturin kann vera á skúlanum, tá høli og lærarar eru tøkir. Í lotuni fáa nógvir føroyingar hesa útbúgving á donskum húsarhaldsskúlum.

Til greiðleika skal viðmerkjast, at sjálvur húsarhaldsskúlin er framvegis ein prógvtøkufrír skúli.

Til § 2:

Húsarhaldsskúlar eiga at vera vistarskúlar. Hesin skúlaformur byggir á, at næmingarnir hava eina felags ábyrgd fyri øllum arbeiðinum á skúlanum, bæði skularbeiði og tí, sum hendir í frítíðini. Leiðsla skúlans ger, saman við næmingunum og lærarunum atferðarreglur. Sjálvt um skúlin er ein vistarskúli, skulu næmingar, sum av ymiskum orsøkum eru noyddir at búgva uttanfyri skúlan, eisini kunna

ganga á skúlamum. Talan kann m.a. vera um tilkomnar nemingar, nemingar við børnum o. a.

Til § 4, nr. 1:
Sambært orðingini í 1. stk. 3 í løgtingslóg nr. 47 frá 9. mai 1976 um stuðul til húsarhaldsskúlar kann góðkenningin av einum húsarhaldsskúla verða knýtt at einum einstaklingi ella einum felag. Fyri at fáa eina javnari skipan av skúlaverkinum verður mælt til, at húsarhaldsskúlar skulu vera sjálvsognarstovnar. Viðmerkjast skal, at Klaksvíkar Húsmøðrafelag tekur undir við uppskoti Landsskúlafyrisitingarinnar, at Húsarhaldsskúli Føroya verður sjálvsognarstovnur.

Til § 4, nr. 2:
Nevndin í sjálvsognarstovninum ger tilmæli til Landsskúlaráðið um setan og loysn úr starvi av fyristøðufólki og lærarum, men Landsskúlaráðið ávikavist setir í starv og loysir úr starvi fyristøðufólk og lærarar, sbrt. § 35, stk. 2 í lóg um hægri skúlafyrisiting.

Til § 5, stk. 4:
Um so verður, at skúlin verður avtikin, verður mælt til, at ognarvirði skúlans verða sett í grunn. Peningurin úr grunninum skal nýtast sum stuðul til lesandi, sum útbúgva seg innanfyri tað húsliga økið.

Til § 6, stk. 2:
Landsskúlafyrisitingin hevur eftirlitið við stovnunum og eigur av somu orsøk ikki at verða umboðað í nevndini, men fulltrúin, sum hevur húsarhaldsskúlan sum málsøki, skal hinvegin altíð kunna vera við á nevndarfundum, fyri at kunna seg um mál, sum verða viðgjørd.

Til § 8, stk. 1:
Sambært § 5, stk. 2 í løgtingslóg um hægru skúlafyrisitingina hevur Landsskúlastjórin ta dagligu fyrisitingarligu, pedagogisku og fakligu ábyrgdina fyri virkseminum innan skúlaskapin.

Nevndin fyri sjálvsognarstovnin hevur eftirlitið við skúlanum, men undir ábyrgd Landsskúlastjórans. Sambært § 2, stk. 6 í reglugerð fyri Landsskúlastjóran, kann Landsskúlastjórin heimila starvsfólkinum á Landsskúlafyrisitingini at útinna uppgávur, sum annars eru álagdar honum. Hetta er orsøkin til orðingina "undir ábyrgd Landsskúlafyrisitingarinnar".

Til § 11, stk. 2, nr. 1:
Skúlin kann hava tvey 20 viku long skeið ella eitt 20 viku langt skeið og fleiri styttri skeið, men eitt skeið kann ongantíð vera styttri enn eina viku/fimm samanlagdar dagar, skal tað fáa almennan stuðul.

Til § 11, stk. 2, nr. 2:
Ein ársnæmingur er ein næmingur býttur við 40 í x vikur. Dømi:

Skúlin hevur eitt 20 viku langt skeið við 12 næmingum (12/40 x 20 = 6) og eitt 12 viku langt skeið við 16 næmingum (16/40 x 12 = 4,8). Tilsamans 10,8 árs-næmingar.

Til § 12, stk. 2:
Studningurin til næmingar verður veittur samb. kunngerð nr. 80 frá 1. august 1991 um veiting av næmingastudningi til næmingar á Húsarhaldsskúla Føroya.

Til § 16, stk. 2:
Talan er eisini her um ein fíggjarligan spurning bæði hjá tí almenna og sjálvsognarstovnunum, sum má greiðast, og tí verður rátt til, at hesin partur av gildisreglunum ikki verður settur í gildi alt fyri eitt.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 131/1991: Løgtingslóg um húsarhaldsskúlar:

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

132. Ígildissetan av "lov om en værdipapircentral"

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til at seta í gildi í Føroyum "lovbekendtgørelse nr. 101 af 10. februar 1992 om en værdipapircentral" við hesari broyting: "Udstedelse af færøske aktier og obligationer m.v., der noteres på Københavns Fondsbørs, kan registreres som fondsaktiver, såfremt dette ønskes af den færøske udsteder."

Viðmerkingar:

Ríkislóg nr. 197 frá 14. mai 1980 við seinni broytingum um eina virðisbrævamiðstøð við seinni broyting er ongantíð sett í gildi í Føroyum.

Eftir § 1 í lógini skal øll útgáva av obligatiónum og partabrøvum, sum skulu noterast á Københavns Fondsbørs, fara fram gjøgnum virðisbrævamiðstøðina, t.v.s. at ongar fysiskar obligatiónir verða nýttar, men bert eitt skrásett krav. Tann skráseting av rættindum, sum eftir 8 í lógini kemur í staðin fyri at eiga fysisk virðisbrøv, skal gerast av teim kontoførandi stovnunum:

Hesir eru:

1. Danmarks Nationalbank og Kongeriget Danmarks Hypotekbank og Finansforvaltning,
2. bankar, sparikassar og lutakassar (peningastovnar),
3. stovnar, sum eru umfatað av lóg um ávísar kredittstovnar, og sum av fíggjarmálaráðharranum sambært serligari lóg góðkennast sum kontoførandi stovnar,
4. børsmeklarafeløg,
5. virkir, sum verða rikin í felag av virkjum umfatað av nr. 2-4, og sum hava til endamáls at umsita virðisbrøv og
6. realkredittstovnar og aðrir obligatiónsútgevandi stovnar, í tann mun talan er um fondsaktivir, sum eru útgivin av avvarðandi stovni.

Tann stovnurin, sum stendur fyri útgávuni av obligatiónunum, hevur tó møguleika fyri at gera avtalu við ein annan kontoførandi stovn, sum hevur gjørt tilknýt-

isavtalu við virðisbrævamiðstøðina um, at hesin stovnur kemur í útgevarans stað sum kontoførandi stovnur.

Føroysku bankarnir eru limir í virðisbrævamiðstøðini, men eru av praktiskum orsøkum ikki kontoførandi bankar. Teir eru knýttir at bankasambandi teirra í København, sum er kontoførandi teirra vegna.

Verður lógin um eina virðisbrævamiðstøð sett í gildi í Føroyum óbroytt, hevur hon við sær, at tann stovnurin í Føroyum, sum gevur út obligatiónir, skal knýtast at virðisbrævamiðstøðini, um so er, at tær obligatiónir, stovnurin hevur givið út, skulu noterast á Københavns Fondsbørs.

Hetta kann gerast antin við at gera eina tilknýtisavtalu við virðisbrævamiðstøðina ella at gera eina avtalu við ein kontoførandi stovn um, at hesin kemur í útgevarans stað sum kontoførandi stovnur.

Eisini skulu hereftir obligatiónir, sum verða givnar út í Føroyum, skrásetast í virðisbrævamiðstøðini, um so er, at tær skulu kunna noterast á Københavns Fondsbørs.

Men við tí broyting í lógini, sum skotin er upp, kunnu føroysk partabrøv og obligatiónir skrásetast í virðisbrævamiðstøðini, um so er, at føroyski útgevarin av obligatiónunum ynskir tað.

Hetta skuldi verið ein smidligari formur, við tað at ein ikki skal, men kann skráseta virðisbrøv, um ein ynskir tað.

Hetta er eisini tann máti, Grønland hevur valt, tá teir settu lógina í gildi.

Tað er ikki neyðugt, at verandi obligatiónir, sum eru í umfari, og sum eru noteraðar á Kobenhavns Fondsbørs, fara at verða innkallaðar til skráseting í virðisbrævamiðstøðini.

Annars kann virðisbrævamiðstøðin eisini skráseta virðisbrøv, sum ikki eru noterað á Københavns Fondsbørs.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 132/1991: Í gildissetan av "lov om en værdipapircentral".

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur havt fund við Sigmund Poulsen, stjóra, og Jens Erik Rasmussen í Landsbankanum og fingið frágreiðingar um stovnin.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtingium til at samtykkja málið.

133. Fólkaatkvøða um broytingar í EEC- sáttmálanum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið viðmælir viðlagda uppskot til "Lov om undladelse af folkeafstemning på Færøerne og i Grønland om forslag til lov om ændring af lov om Danmarks tiltrædelse af De Europæiske Fællesskaber m. v. (Danmarks tiltrædelse af Traktaten om Den Europæiske Union)".

Viðmerkingar:

Danski forsætismálaráðharrin hevur gjørt av, at fólkaatkvøða skal haldast í Danmark um spurningin, um Danmark skal góðkenna sáttmálan um Europeisku Felagsskapin.

Lógaruppskotið um danska góðkenning av broytingini í EEC- sáttmálanum skal viðgerast eftir § 20 í grundlógini. Fæst ikki ein meiriluti fyri lógaruppskotinum uppá 5/6 av fólkatingslimunum, skal uppskotið havnast ella góðkennast við eini fólkaatkvøðu eftir § 42 í grundlógini um fólkaatkvøðu.

Eftir § 49 í fólkatingsvallógini fyri Føroyar skulu fólkaatkvøður eftir § 20 í grundlógini eisini fara fram í Føroyum, um so er, at undantak ikki verður gjørt í lógini, og er tað hetta, sum verður gjørt í fyriliggjandi lógaruppskoti.

Tá Føroyar ikki eru limir í EEC, og upprunaligi sáttmálin sostatt ikki er galdandi fyri Føroyar, verður skotið upp, at fólkaatkvøða ikki verður í Føroyum um sáttmálabroytingina. Fólkaatkvøða var heldur ikki hildin í Føroyum í 1972 í samband við, at Danmark fór upp í Felagsmarknaðin.

Landsstýrið fer at lata eina kanning gera, um hvørjar avleiðingarnar verða fyri Føroyar, um Danmark gerst partur av Europeiska Felagsskapinum.

Álit

í

løgtingsmáli nr. 133/1991: Fólkaatkvøða um broytingar í EEC-sáttmálanum.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Birgir Danielsen, Sverre Midjord, Heini Johansen,

Edmund Joensen og Tordur J. Niclasen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Hergeir Nielsen) heldur, at soleiðis sum málið er upplýst fyri tinginum, er ikki gjørligt at taka støðu til tað enn.

Málið (133/1991) kom á tingbordið eina viku eftir, at Tjóðveldisflokkurin í tingmáli nr. 108/1991: Ríkisrættarligu viðurskifti Føroya hevði reist spurningin um avleiðingarnar av fólkaatkvøðuni í Danmark tann 2. juni í ár.

Uppskot landsstýrisins er eitt tilmæli um at taka undir við einum ikki reinskrivaðum uppskoti til fólkatingslóg, sum landsstýrið hevur fingið sendandi frá innanríkismálaráðnum ein heilan mánaða framman undan, ella tann 18. februar 1992.

Í "Bemærkninger til lovforslaget", sum er viðheft framløgdu kladduni, verður m. a. sagt frá innanríkismálaráðnum:

"Færøerne er ikke medlem af EF, Grønland har status af oversøisk område i henhold til EF-traktatens fjerde del. Færøernes og Grønlands status i forhold til EF er fastlagt i paragraf 8 og paragraf 9 i loven om Danmarks tiltrædelse af De Europæiske Fællesskaber som ændret ved lov nr. 259 af 28. maj 1984. På denne baggrund foreslås det i dette lovforslag efter aftale med Færøernes Landsstyre og Grønlands Landsstyre, at folkeafstemning om lovforslagtet om Danmarks tiltrædelse af Traktaten om Den Europæiske Union ikke skal afholdenspå Færøerne og i Grønland. I 1972 blev der ikke afholdt folkeafstmning på Færøerne om forslag til lov om Danmarks tiltrædelse af De Europæiske Fællesskaber."

Við at vísa til lóg nr. 259 frá 28. mai 1984 sigur innanríkismálaráðið einki um ásetingarnar um m.a. tær ræðisavhendingar, sum eru innbygd í Maastrichttraktatini, sum fólkaatkvøðan snýr seg um, og sum kunnu fáa stórar avleiðingar fyri Føroyar.

Innanríkismálaráðið vísir eisini til avtalu við landsstýrið um ikki at luttaka í atkvøðugreiðsluni. Henda avtala er ikki kunnað tinginum, og ikki er grett orð um, hvat stendur í hesi avtalu.

Innanríkismálaráðið sigur ikki eitt orð um, hvat fólkaatkvøðan snýr seg um, men vísir til, at vit ikki eru limir í EF. Sagt við øðrum orðum, so fáa vit at vita tað, vit vita, og ikki at vita tað, sum vit ikki vita.

Landsstýrið sigur, at tað fer at kanna málið. Nær, hvar og hvussu fær tingið heldur einki at vita um.

Í uppskotinum eru snøgt sagt ongar upplýsingar um komandi fókaatkvøðu í Danmark, og tað er hesa, ið løgtingið skal taka støðu til.

At fáa at vita frá Innanríkismálaráðnum, at vit eru uttanfyri, og frá landsstýrinum at tað fer at kanna málið, er ov lítið hjá løgtinginum at taka støðu út frá, og verður tí mælt løgtinginum til at bíða við at taka støðu til hetta tingmál fyrrenn tingmál nr. 108/1991: Ríkisrættarligu viðurskifti Føroya er avgreitt av tinginum.

134. Løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn

Uppskot

til

Løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn.

Bólkur I.
Endamál,

§ 1.

Savnini hjá almennum stovnum, samanber §§ 4 og 5, skulu goymast og varðveitast við tí í hyggju at síggja til rættin til og tørvin á upplýsing og gransking.

Stk. 2. Um savnindi ríkisins Føroyum viðvíkjandi verður landsstýrinum heimilað at gera avtalu við avvarðandi ríkismyndugleika.

§ 2.

Føroya Landsskjalasavn, hereftir nevnt landsskjalasavnið, skal savna, skipa, varðveita, lýsa og røkja tey skjøl, sum almennir stovnar avhenda til savnið.

Stk. 2. Viðvíkjandi savnindum hjá privatum verður víst til bólk IV.

§ 3.

Landsskjalasavnið skal veita almennum stovnum, privatum og granskingini upplýsingar frá søvnum sínum. Fyri hesar tænastur kann landsskjalasavnið áseta gjald eftir reglum, sum landsstýrið góðkennir.

Stk. 2. Landsskjalasavnið skal sjálvt ella í samstarvi við onnur inna gransking í tilknýti til savn tess.

Lagtingslov om Færøernes Landsarkiv.

Kapitel I.
Formål.

§ 1.

De offentlige institutioners arkivalier, jfr. §§ 4 og 5, skal bevares og varetages med det for øje at tilgodese retten til og behovet for information og forskning.

Stk. 2. Om statens arkivalier vedrørende Færøerne bemyndiges landsstyret til at indgå aftale med vedkommende statsmyndighed.

§ 2.

Færøernes Landsarkiv, herefter benævnt landsarkivet, skal indsamle, ordne, bevare, beskrive og varetage det materiale, som de offentlige institutioner afleverer til arkivet.

Stk. 2. Vedrørende private arkivalier henvises til kapitel IV.

§ 3.

Landsarkivet skal stille oplysninger fra sine samlinger til rådighed for offentlige institutioner, private og forskningen. For disse tjenesteydelser kan landsarkivet fastsætte vederlag efter regler, som landsstyret godkender.

Stk. 2. Landsarkivet skal alene eller i samarbejde med andre udføre forskning i tilknytning til sine samlinger.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur gjøllari reglur fyri virksemi landsskjalasavnsins.

Bólkur II.
Skjalasøvn hjá almennum stovnum.

§ 4.

Heitið almennur stovnur, hereftir nevndur stovnur, fevnir um løgting og landsstýri og stovnar teirra, kommunur og felagskommunur og kommunalar eins og felagskommunalar stovnar, stovnar við lógásettum einaretti, sjálvsognarstovnar og privatar stovnar, sum heilt ella fyri meginpartin verða riknir fyri almenman pening, ella sum røkja uppgávur vegna tað almenna.

§ 5.

Heitið savnindi fevnir um skrivligt tilfar eins og øll onnur sløg av tilfari, sum gevur upplýsing og er vorðið til ella fingið til vegar í sambandi við tænastuvirki hjá stovninum og hjá starvsfólki hansara. Fyri kort, tekningar og ætlanir, ljósmyndir, filmar og smáfilmar, ljómfløgur, ljóðbond, holkort, magnetbond, disklar og aðrar miðlar til at viðgera og goyma upplýsingar galda somu reglur sum fyri savnindi annars, um tey eru partur av skjalasavninum hjá stovninum.

§ 6.

Undir eftirliti av landsskjalasavninum hevur stovnurin ábyrgdina fyri, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt.

Stk. 2. Landsskjalasavnið er í skjalasavnsviðurskiftum ráðgevi hjá stovni-

Stk. 3. Landsstyret fastsætter de nærmere regler for landsarkivets virksomhed.

Kapitel II.
Offentlige institutioners arkiver.

§ 4.

Betegnelsen offentlig institution, herefter benævnt institution, omfatter lagtinget og landsstyret og deres institutioner, kommuner og fælleskommuner og kommunale samt fælleskommunale institutioner, institutioner med lovbestemt monopol, selvejende institutioner og private institutioner, som helt eller overvejende drives for offentlige midler, eller som varetageropgaver på det offentliges vegne.

§ 5.

Betegnelsen arkivalier omfatter såvel skriftligt materiale som enhver anden art af materiale, der formidler information og er blevet til eller tilvejebragt i forbindelse med institutionens og dens medarbejderes tjenstlige virke. For kort, tegninger og planer, fotografier, film og mikrofilm, grammofonplader, lydbånd, hulkort, magnetbånd, disketter og andre medier til behandling og opbevaring af data, gælder de samme regler som for de øvrige arkivalier, for så vidt de er en del af institutionens arkiv.

§ 6.

Under tilsyn af landsarkivet har institutionen ansvaret for arkivdannelsen og for forsvarlig opbevaring af arkivet.

Stk. 2. Landsarkivet er i arkivanliggen der institutionens konsulent, herunder i

num, eitt nú í spurningum um málsgerð, uppbygging av skjalasavni og gerð av yvirlitum yvir innihaldið í skjalasøvnunum og í spurningum um vanlig goymsluviðurskifti á skjalasøvnunum.

Stk. 3. Landsskjalasavnið hevur eftirlit við skjalasøvnum stovnanna og ásetur reglur um skipan teirra.

Stk. 4. Ætlanir um nýggj skjalasavnshøli skulu verða løgd fyri landsskjalasavnið til góðkenningar.

Stk. 5. Avhendingarskyldug savnindi kunnu bert verða beind burtur eftir reglum, sum landsstýrið ásetur.

spørgsmål om sagsdannelse, arkivdannelse og udarbejdelse af fortegnelser over arkivernes indhold og i spørgsmål om almindelige opbevaringsforhold i arkiverne.

Stk. 3. Landsarkivet fører tilsyn med institutionernes arkiver og fastsætter regler for deres ordning.

Stk. 4. Planer for nye arkivlokaler skal forelægges landsarkivet til godkendelse.

Stk. 5. Afleveringspligtige arkivalier må kun kasseres ifølge regler, som landsstyret fastsætter.

§ 7.

Stovnarnir avhenda eftir reglum, sum landsskjalasavnið ásetur, savnindi teirra til landsskjalasavnið, tá savnindini eru 30 ára gomul, uttan so at landsskjalasavnið ásetur aðrar freistir.

Stk. 2. Landsskjalasavnið kann sleppa stovni undan at avhenda savnindi, sum javnan verða brúkt í dagliga arbeiðinum.

Stk. 3. Avhendingaskyldan fevnir ikki um savnindi, sum eru partur av vísindaligu søvnum stovnsins.

Stk. 4. Savnindi frá stovni, sum er avtikin, skulu beinanvegin verða avhend landsskjalasavninum, uttan so at annar stovnur, sum yvirtekur málsøki avtikna stovnsins, skal brúka hesi savnindi.

§ 7.

Institutionerne afleverer efter regler, som landsarkivet fastsætter, deres arkivalier til landsarkivet, når arkivalierne er 30 år gamle, medmindre landsarkivet fastsætter andre frister.

Stk. 2. Landsarkivet kan fritage en institution for aflevering af arkivalier, som til stadighed anvendes i det løbende arbejde.

Stk. 3. Afleveringspligten omfatter ikke arkivalier, som er en del af en institutions videnskabelige samlinger.

Stk. 4. Arkivalier fra en ophævet institution skal straks afleveres til landsarkivet, medmindre en anden institution, der overtager den ophævede institutions sagsområde, skal bruge disse arkivalier.

§ 8.

Tá stovnur avhendir landsskjalasavninum savnindi, tekur landsskjalasavnið við ábyrgdini fyri forsvarligari goymslu og skipan av savnindunum.

§ 8.

Når en institution afleverer arkivalier til landsarkivet, overtager landsarkivet ansvaret for arkivaliernes forsvarlige opbevaring og ordning.

§ 9.

Savnindi hjá stovni kunnu ikki verða keypt, seld ella latin á annan hátt.

Stk. 2. Eru savnindi hjá stovni komin á privatar hendur, skulu tey beinanvegin og uttan viðurlag verða latin avvarðandi stovni ávikavist landsskjalasavninum aftur.

Stk. 3. Rættindi landsins til savnindi hjá stovnum verða ikki burturmist við avogning ella hevd.

Bólkur III.
Atgeingi.

§ 10.

Øll hava atgeingi at savnseindum, sum stovnar hava avhent landsskjalasavninum, tá eindirnar eru 30 ára gamlar, sí tó §§ 11 og 12.

§ 11.

Stovnurin, ið avhendir, kann í samráð við landsskjalasavnið áseta eina longri atgeingifreist enn 30 ár fyri savnseindir ella bólkar av hesum, um hetta er neyðugt til tess at tryggja serlig fyrilit fyri:

1) verju av skuldsettum, vitnum ella øðrum í agamálum,
2) búskaparligum áhugamálum hjá tí almenna, herundir fremjan av vinnuvirksemi hjá tí almenna,
3) búskaparligum áhugamálum hjá einstaklingum ella privatum virkjum í at verja upplýsingar um tøkniligar skipanir ella arbeiðshættir ella upplýsingar um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella tílíkt ella

§ 9.

En institutions arkivalier kan ikke gøres til genstand for køb, salg eller anden overdragelse.

Stk. 2. Er en institutions arkivalier kommet i privat besiddelse, skal de straks og uden vederlag afleveres til vedkommende institution henholdsvis landsarkivet.

Stk. 3. Landets rettigheder til institutioners arkivalier kan ikke ophøre ved ekstinktion eller hævd.

Kapitel III.
Tilgængelighed.

§ 10.

Arkivenheder, som institutioner har afleveret til landsarkivet, er tilgængelige for enhver, når de er 30 år gamle, jfr. dog §§ 11 og 12.

§ 11.

Den afleverende institution kan efter drøftelse med landsarkivet fastsætte en længere tilgængelighedsfrist end 30 år for arkivenheder eller grupper af disse, hvis dette er nødvendigt til beskyttelse af væsentlige hensyn til:

1) sigtede, vidner eller andre i sager om disciplinær forfølgning,
2) det offentliges økonomiske interesser, herunder udførelsen af det offentliges forretningsvirksomhed,
3) enkeltpersoners eller private selskabers økonomiske interesse i at beskytte oplysninger om tekniske indretninger eller fremgangsmåder eller om drifts- eller forretningsforhold eller lignende eller

4) privatum og almennum áhugamálum, har serlig viðurskifti krevja, at mál verða hildin loynilig.

§ 12.

Atgeingifreistin er 80 ár fyri savnseindir ella bólkar av hesum, sum

1) innihalda upplýsingar um privat, herundir búskaparlig viðurskifti hjá einstaklingum,
2) viðvíkja skráum, sum løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum fevnir um,
3) fevna um brevaskifti millum stovnar og serkøn til nýtslu í rettarmálum, ella tá umhugsað verður, um rettarmál eigur at verða reist, ella
4) fevna um tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag fyri gerð av almennum hagtølum hjá Hagstovu Føroya.

Stk. 2. Stovnurin, ið avhendir, kann, har viðmerkiftini tala fyri tí, í samráð við landsskjalasavnið áseta eina styttri ella longri atgeingifreist fyri savnseindir, ið eru nevndar í stk. 1.

§ 13.

Atgeingifreistin verður roknað frá tí árið, tá ein savnseind endar.

§ 14.

Landsskjalasavnið kann í ávísum førum loyva nýtslu av eini savnseind ella bólkum av hesum, áðrenn atgeingifreistin er úti, sí tó stk. 2-4.

Stk. 2. Loyvi eftir stk. 1 er treytað av, at avvarðandi stovnur hevur játtað hesum, um

4) private og offentlige interesser, hvor hemmeligholdelse efter forholdets særlige karakter er påkrævet.

§ 12.

Tilgængelighedsfristen er 80 år for arkivenheder eller grupper af disse, der

1) indeholder oplysninger om enkeltpersoners private, herunder økonomiske forhold,
2) vedrører registre, der er omfattet af lagtingslov om offentlige myndigheders registre,
3) omfatter institutioners brevveksling med sagkyndige til brug i retssager eller ved overvejelse af, om retssag bør føres, eller
4) omfatter materiale, der tilvejebringes som grundlag for udarbejdelse af offentlig statistik ved Hagstova Føroya.

Stk. 2. Den afleverende institution kan, hvor forholdene taler derfor, efter drøftelse med landsarkivet fastsætte en kortere eller længere tilgængelighedsfrist for arkivenheder, der er omfattet af stk. 1.

§ 13.

Tilgængelighedsfristen regnes fra en arkivenheds slutningsår.

§ 14.

Landsarkivet kan i konkrete tilfælde meddele tilladelse til benyttelse af en arkivenhed eller grupper af disse inden udløbet af tilgængelighedsfristen, jfr. dog stk. 2-4.

Stk. 2. Det er en betingelse for at meddele tilladelse efter stk. 1, at vedkommende institution har givet sit samtyk-

1) stovnurin, ið avhendir, hevur ásett eina longri atgeingifreist eftir § 11,
2) ein savnseind fevnir um tilfar av tí slagnum, sum er nevnt í § 12, stk. 1, pkt. 2)-4), ella
3) ein savnseind er avhend landsskjalasavninum, áðrenn hon er 30 ára gomul, og hon fevnir um tilfar av tí slagnum, sum er nevnt í § 11.

Stk. 3. Loyvi eftir stk. 1 krevur herumframt samtykki frá Skrásetingareftirlitinum, um savnseindin fevnir um tilfar av tí slagnum, sum er nevnt í § 12, stk. 1, pkt. 2).

Stk. 4. Landsstýrið ásetur gjøllari reglur um atgeingi og um treytir fyri nýtslu av teimum upplýsingum, sum atgeingi verður givið til.

§ 15.

Tann, ið fær atgeingi at savnseindum, sum ikki eru beinleiðis atgeingiligar, hevur ikki loyvi uttan heimild at almannakunngera, lata víðari ella nýta upplýsingar, sum eru givnar í trúnaði, og sum viðkomandi í hesum sambandi hevur fingið kunnleika til. Ein upplýsing er givin í trúnaði, tá hon í lóg ella aðrari galdandi ásetan er ásett at vera tað, ella tá tað annars er neyðugt, at hon verður hildin loynilig av týðandi fyriliti fyri almennum ella privatum áhugamálum.

ke hertil, når

1) den afleverende institution har fastsat en længere tilgængelighedsfrist efter § 11,
2) en arkivenhed indeholder materiale af den karakter, der er nævnt i § 12, stk. 1, nr. 2)-4), eller
3) en arkivenhed er afleveret til landsarkivet, inden den er 30 år gammel, og den indeholder materiale af den karakter, der er nævnt i § 11.

Stk. 3. Tilladelse efter stk. 1 kræver endvidere samtykke fra Registertilsynet, hvis arkivenheden indeholder materiale af den karakter, der er nævnt i § 12, stk. 1, nr. 2).

Stk. 4. Landsstyret fastsætter nærmere regler om tilgængelighed og om vilkår for brugen af de oplysninger, der gives adgang til.

§ 15.

Den, der får adgang til arkivenheder, som ikke er umiddelbart tilgængelige, må ikke uberettiget offentliggøre, videregive eller udnytte fortrolige oplysninger, hvortil den pågældende i den forbindelse har fået kendskab. En oplysning er fortrolig, når den ved lov eller anden gyldig bestemmelse er betegnet som sådan, eller når det i øvrigt er nødvendigt at hemmeligholde den for at varetage væsentlige hensyn til offentlige eller private interesser.

Bólkur IV.
Privat savnindi.

§ 16.

Landsskjalasavnið savnar, tekur ímóti og tryggjar privat savnindi, sum verða

Kapitel IV.
Private arkivalier.

§ 16.

Landsarkivet indsamler, tager imod og sikrer private arkivalier, der nu antages

bildin at hava stóran granskingarligan ella mentunarligan týdning.

Stk. 2. Slík privat savnindi, sum ikki eru avhend landsskjalasavninum, eigur savnið at skráseta. Skrásetingin hevur við sær, at eigarin fær skyldu at boða landsskjalasavninum frá, um eigaraviðurskiftini verða broytt, ella savnindini verða flutt.

Stk. 3. Verða skrásett savnindi flutt av landinum, hevur eigarin skyldu at geva landsskjalasavninum høvi at taka avrit av savnindunum, áðrenn tey verða útflutt.

Bólkur V.
Revsing og gildiskoma.

§ 17.

Tann, sum brýtur § 15, kemur undir bót, hefti ella fongsul upp til 6 mánaðir.

§ 18.

Tann, sum brýtur ásetanirnar í § 9, stk. 2 og § 16, stk. 2 og 3, kemur undir bót.

§ 19.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Lógin er eisini galdandi fyri savnindi, ið eru vorðin til hjá stovni ella eru komin stovni í hendi, áðrenn lógin fær gildi.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur gjøllari reglur um atgongi at savnindum, ið eru avhend landsskjalasavninum, áðrenn lógin fær gildi.

Stk. 4. Samstundis, sum lógin fær gildi, fara úr gildi §§ 10-15 í løgtingslóg nr. 31 frá 2. mai 1952 um landsbókasavn v. m.

at have stor forskningsmæssig eller kulturel betydning.

Stk. 2. Sådanne private arkivalier, som ikke er afleverede til landsarkivet, bør arkivet registrere. Registreringen medfører, at ejeren forpligtes til at give meddelelse til landsarkivet, hvis ejerforholdet eller opbevaringsstedet ændres.

Stk. 3. Ved udførsel af registrerede arkivalier er ejeren forpligtet til at give landsarkivet adgang til at kopiere arkivalierne inden udførelsen.

Kapitel V.
Straf og ikrafttræden.

§ 17.

Den, der overtræder § 15, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 6 måneder.

§ 18.

Den, der overtræder bestemmelserne i § 9, stk. 2 og § 16, stk. 2 og 3, straffes med bøde.

§ 19.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Stk. 2. Loven gælder også for arkivalier, der er blevet til hos en institution eller er kommet i en institutions besiddelse før lovens ikrafttræden.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter nærmere regler om tilgængelighed til arkivalier, der er afleveret til landsarkivet før lovens ikraftræden.

Stk. 4. Samtidig med lovens ikrafttræden ophæves §§ 10-15 i lagtingslov nr. 31 af 2. maj 1952 om landsbibliotek m. v.

Viðmerkingar:

Í skrivi, sum var dagfest 27. september 1988, setti landsstýrið eftir uppskoti frá Føroya Landsskjalasavni eina nevnd við tí setningi at gera uppskot til nýggja lóg um Føroya Landsskjalasavn og virksemi tess.

Nevndin hevur handað landsstýrinum álit á Grækarismessu 1992, og álitið er hjálagt hesum løgtingsmáli sum skjal.

Galdandi reglur um Føroya Landsskjalasavn eru §§ 10-15 í løgtingslóg um landsbókasavn v.m. nr. 31 frá 2. mai 1952 sum broytt við løgtingslóg nr. 23 frá 9. apríl 1964.

Í álitinum setir nevndin fram uppskot til eina løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn, ið gjølla fastleggur endamál landsskjalasavnsins, viðurskifti landsskjalasavnsins við almennar stovnar og aðrar, atgeingi til skjøl og viðurskiftini viðvíkjandi ávísum privatum skjølum.

Landsstýrið er samt í niðurstøðuni hjá nevndini sum heild og leggur sostatt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn samsvarandi tí uppskotinum, sum nevndin hevur sett fram í álitinum, við nøkrum fáum broytingum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 134/1991: Løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Jákup Thorsteinsson, deildarstjóra í landsstýrinum, og Inger Christiansen, landsstýrisfulltrúa, og hevur nevndin fingið upplýst hví ávísar broytingar eru gjørdar í lógaruppskotinum í mun til tað uppskot, ið arbeiðsbólkurin, ið settur varð, handaði landsstýrinum.

Eisini hevur nevndin havt fund við Jóannes Dalsgaard, landskjalavørð fyri at lýsa ávísar spurnigar.

Frá landsbókavørðinum er komið skriv til nevndina, dagfest 27. mars 1992, við viðmerkingum til fyriliggjandi lógaruppskot viðvíkjandi privatum søvnum og søvnum, ið hava beinleiðis tilknýti til føroyskar yrkis- og fagurbókmentir.

Nevndin er av teirri áskoðan, at neyðugt er at seta lógina §4 samband uppskotinum frá arbeiðsbólkinum og tá §3,stk. 3 í uppskoti landsstýrisins er orðað eins og § 4 stk. 2 í uppskotinum, verður neyðugt at strika § 3, stk. 3 tí hetta er varveitt í § 4 í uppskotinum frá arbeiðsbólkinum, og verður sostatt sett fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins..

1. Í § 3 gongur út stk. 3.	**1.** I § 3 udgår stk. 3.
2. Sum § 4 verður sett:	**2.** Som § 4 indsættes:
"Landsskjalasavnið er stovnur undir landsstýrinum undir leiðslu av einum landsskjalavørði, sum landsstýrið setir.	"Landsarkivet er en institution under ledelse af en landsarkivar, som landsstyret udnævner.
Stk. 2. Landsstýrið ásetir gjøllari reglur fyri virkseminni landsskjalasavnsins."	**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter de nærmere regler for landsarkivets virksomhed."
3. § 4 í uppskotinum verður § 5 og § 5 - 19 verða § 6 - 20.	3. § 4 i forslaget bliver § 5 og § 5 - 19 bliver § 6 - 20.

Vísandi til omanfyristandandi broytingaruppskot, mælir ein samd nevnd tingnum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

135. Løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju

Uppskot

til

Løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju.

Umráði

§ 1.

Til landskassan verður at rinda kr. 1,00 fyri hvønn lítur av smyrjiolju (tariffnr. 27.10.00.81 og 27.10.00.89 í toll- og vøruskránni).

Gjald

§ 2.

Gjaldið skal rindast av tí, sum innflytir ella framleiðir nevndu vørur.

Stk. 2. Gjaldið verður innkravt av tollvaldinum og gjaldsskylda, frítøka, endurrindan, innkrevjing, eftirlit o.a., verða sum ásett í løgtingslóg um toll.

Innsavningarskipan og viðgerð

§ 3.

Landsstýrinum verður heimilað at gera avtalu við innsavnara og burturbeinara um innsavnan og viðgerð av spillolju og um gjald fyri hetta.

Revsireglur

§ 4.

Brot á §§ 1 og 2 verða revsað sambært ásetingunum í kap. 10 í løgtingslóg um toll.

Lagtingslov om miljøafgift på smøreolie.

Område

§ 1.

Til landskassen betales der kr. 1,00 pr. liter smøreolie (tarifnr. 27.10.00.81 og 27.10.00.89 i told- og vare- fortegnelsen).

Afgift

§ 2.

Afgiften betales af importører eller producenter af den nævnte vare.

Stk. 2. Afgiften opkræves af toldmyndighederne, og for betalingspligt, fritagelse, refundering, opkrævning, kontrol m.v. finder reglerne i lagtingslov om told anvendelse.

Indsamlingsordning og behandling

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til at træffe aftale med indsamler og affaldshåndterer om indsamling og behandling af spildolie, samt betaling for dette.

Strafferegler

§ 4.

Overtrædelse af §§ 1 og 2 vil blive straffet jfr. bestemmelserne i kap. 10 i lagtingsloven om toldanvendelse.

Gildi o.a.

§ 5.

Landsstýrinum verður heimilað at áseta, at aðrir líknandi oljuúrdráttir, eitt nú hydraulikolja og gearolja eisini koma undir reglurnar í hesi lóg.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Ikrafttræden m.m.

§ 5.

Landsstyret bemyndiges til at fastsætte, at andre lignende olieprodukter f.eks. hydraulikolie og gearolie, også kommer under denne lovs regler.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar.

Út frá nøgdini av innfluttari smyrjiolju í mun til nøgdina av spillolju, sum verður latin inn til viðgerðar má metast, at einans 1/3 av spilloljuni í Føroyum verður latin inn til viðgerðar.

Í tølum, er hetta fyri 1991 eini 600 tons, sum verða viðgjørd umhvørvisvinarliga til endurnýtslu, meðan 1.200 tons "hvørva" uttan nakra viðgerð.

Ein orsøk til at so lítil mongd verður latin til viðgerðar á ein umhvørvisvinarligan hátt, er óivað, at uml. kr. 0,50 skulu rindast fyri hvønn lítur, sum verður viðgjørdur, umframt at innsavnanin, goymslan og flutningurin eisini kosta nakað, tils. uml. kr. 1,50.

Í m.a. Noregi, Íslandi og Finlandi er ókeypis at lata spillolju inn til viðgerðar. Ístaðin verður gjaldið lagt á framleidda ella innflutta smyrjiolju, sum skal fíggja viðgerðina til endurnýtslu, tá oljan er nýtt.

At hetta bøtir munandi um nøgdirnar, sum verða burturbeindar á ein umhvørvisvinarligan hátt, sæst av royndunum í Finlandi. Í 1983, var støðan nakað tann sama sum í Føroyum í dag, tí bert uml. 1/3 av alfari spillolju bleiv innlatin til viðgerðar. Avgørt varð tí, at rindast skuldi eitt gjald til endurnýtslu og møguliga burturbeining, tá smyrjolja varð innflutt ella framleidd, meðan viðgerðin ella burturbeiningin av spillolju var ókeypis. Somuleiðis vórðu reglur gjørdar um strangari eftirlit. Í dag verður nærum øll spillolja viðgjørd á oljureinsiverki, og endurnýtt.

Landsstýrið hevur sjálvsagt umhugsað, um eitt umhvørvisgjald møguliga fer at viðføra, at skipini, sum eru nógv tann stórsti brúkarin av smyrjiolju, keypa smyrjioljuna í útlondum og lata spilloljuna ókeypis inn til viðgerðar í Føroyum.

Fyri at forða fyri hesum, kundi ein í staðin gjørt eina skipan, har havnirnar skuldu tikið ímóti spillolju ókeypis og ístaðin innroknað kostnaðin av innsavnan, flutningi og viðgerð í havnagjøldini. Men partvís kemur spillolja aðrastaðni frá enn skipum, og partvís er ikki samsvar millum smyrjioljunýtslu og skrásett tons,

sum havnagjøld annars vanliga verða roknað eftir. Henda loysn verður tí ikki mett at verða tann rætta.

Fyri tey skip o.o., sum hava burturbeint oljuna á ein hátt, sum ikki stríður móti "lov om havmiljø" ella umhvørvisverndarlógina, vil hetta uppskotið ikki viðføra meirútreiðslur, men hinvegin heldur viðføra minni útreiðslur, tí umhvørvisgjaldið, sum er sett til kr. 1,00 fyri literin, ger at innsavnan, flutningur og viðgerð verða ókeypis í mun til nú, har samlaði kostnaðurin fyri hetta er upp til kr. 1,50 fyri literin.

Sambært lógaruppskotinum verður eitt umhvørvisgjald longu rindað, tá smyrjioljan verður innflutt. Ætlanin er, at hetta gjald skal kunna "dekka" útreiðslurnar við eini innsavningarskipan og rakstur av reinsiverki. Landsstýrinum verður tí heimilað at gera nærri avtalu við innsavnarar og viðgerðarar, um hvussu innsavningin og burturbeiningin skulu fara fram og um gjald fyri hetta.

Umframt hetta lógaruppskot um umhvørvisgjald, hava havnirnar sambært kunngerð um móttøkuskipan av oljurestum- og blandingum, kloakkavlopsvatni og burturkasti í føroyskum havnum, framvegis skyldu at hava eina móttøkuskipan. Kostnaðin av móttøkuskipanini mugu havnirnar sjálvar rokna í havnagjaldið, meðan landskassin ber kostnaðin av innsavnan og flutningi til burturbeiningarvirkið, sambært avtalu við innsavnarar og/ella viðgerðarar.

Eisini verður arbeitt við eini kunngerð um burturkast, har neyvari eftirlit verður ásett, eins og skylda at nýta innsavningarskipanir verður áløgd.

Tá ætlanin er, at tollvaldið skal umsita innkrevjingina, kann hetta gerast í sambandi við innkrevjing av tolli; tí verður ikki roknað við, at uppskotið viðførir nakra starvsfólkaøking, ella útreiðslur fyri fyrisitingina.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1:
Tann innflutta nøgdin broytist alt eftir aktivitetinum í samfelagnum. Í 1991 verður roknað við, at eini 1800 tons verða innflutt. Tær samlaðu inntøkurnar til landskassan vildu í 1991 tí verið umt. 1,8 mió. kr.

Til § 2:
Fyri at gera umsitingina av uppkrevjingini av gjaldinum so einfalda sum gjørligt, verður gjaldið álagt innflytaranum ella framleiðaranum, ístaðin fyri smásøluliðinum ella tí, sum nýtir oljuna.

Til § 3:
Landsstýrið ætlar at gera avtalu við IRF og møguliga KOB um eina burturbeiningarskipan, har burturbeiningin er rindað, longu tá oljan verður keypt.

Umframt viðgerð, skal burturbeiningarskipanin fevna um innsavnan o.a. neyðugt í hesum sambandi. Miðað verður ímóti, at landskassans útreiðslur av hesi skipan verða áleið við inntøkurnar frá umhvørvisgjaldinum.

Hóast gjaldið fyribils bert verður lagt á smyrjiolju, er ætlanin at sáttmálin um eina burturbeiningarskipan, sum er ókeypis at nýta, eisini skal fevna um annað oljuburturkast enn spillolju ein nú gear- og hydraulikolju. Men tá hesar nøgdir eru so smáar, eins og tær kunnu verða skrásettar nógva ymsastaðni í vøru- og tollskránni, hevur landsstýrið fyribils valt ikki at leggja umhvørvisgjald á hesa olju. Í § 5 hevur landsstýrið tó heimild at áseta, at lógin eisini skal galda fyri tílíkar oljuúrdráttir.

Landsstýrið vil í sáttmálanum við innsavnarar sjálvsagt tryggja sær, at spilloljan verður viðgjørt á ein umhvørvisvinarligan hátt og fyri ein rímiligan kostnað.

Tann møguleiki, sum einamest verður hugsað um, er oljureinsiverkið hjá IRF á Kambsdali. Á hesum verkinum verður vatn og annað reinsað frá spilloljuni, so oljan aftaná viðgerina kann nýtast sum brennolja.

Til § 4:

Tá innkrevjingin skal umsitast av tollvaldinum, eins og tollur o. l., verður skotið upp, at revsing og heimildir hjá tollvaldinum verða sum ásett í løgtingslóg um toll.

Til § 5:

Ætlanin við hesi heimild er, at um tað seinni vísir seg, at tað verða størri nøgdir av øðrum oljuburturkasti, enn tí sum stavar frá smyrjiolju, kann landsstýrið áseta umhvørvisverndargjald á hesar oljuúrdráttir.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 135/1991: Løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992, og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í umhvørvisnevndina.

Endamálið við uppskotinum er at fáa sum mest av tí spillolju, ið stendst av smyrjiolju, viðgjørda til endurnýtslu og soleiðis forða fyri, at spilloljan fer út í náttúruna á sjógvi ella landi.

Meting landsstýrisins er, at av teimum 1800 tonsunum av smyrjiolju, ið árliga verða innflutt, verður bert 1/3 latin inn til viðgerðar. Orsøkina til hetta heldur landsstýrið vera, at umleið 0,50 kr. skulu rindast fyri hvønn litur, ið verður viðgjørdur, umframt at innsavning og goymsla eisini kosta (uml. kr. 1,50 pr. l.).

Landsstýrið vísir á, at í eitt nú Noregi og í Finnlandi er tað ókeypis at lata inn spillolju til viðgerðar. Í staðin verður rindað eitt ávíst gjald á framleidda ella innflutta smyrjioljut, og skal hetta gjald so fíggja viðgerðina av spilloljuni.

Uppskot landsstýrisins er at nýta eina tílíka skipan í Føroyum og verður mælt til at leggja umhvørvisgjald á smyrjiolju, tá hon verður innflutt, og verður peningurin nýttur til at fíggja innsavning og viðgerð einahelst á reinsiverkinum hjá IRF á Kambsdali.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fundir við landsstýrismannin í umhvørvismálum og fulltrúa, ið umsitur umhvørvismál á landsskrivstovuni. Á fundinum varð upplýst, at gjaldið fer at geva umleið 1,6 mió. kr., ið sum nevnt verða at fíggja viðgerðina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar. Ein meiriluti (Jóannes Dalsgaard, Eyðun Viderø og Heini Johansen) heldur, at tørvur er á skilagóðum loysnum, ið kunnu forða fyri, at spillolja dálkar umhvørvið og heldur meirilutin, at uppskotið er nýtiligt. Meirilutin mælir tí løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

Ein minniluti (Terje Davidsen) tekur undir við uppskotinum um at fáa sum mest av spillolju til eina skipaða endurnýtslu. Minnilutin vísir á, at einki yvirlit er yvir, hvussu stórur partur av spilloljuni stavar frá smyrjiolju. Eftir hesum lógaruppskoti kemur smyrjioljugjaldið at gjalda fyri alla skipanina. Avgjaldið virkar sostatt sum eitt óneyðuga stórt avgjald upp á smyrjiolju.

Tí verður sett fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum, tá skipanin hevur virkað í eitt hálvt ár, at gera eitt yvirlit yvir, hvussu stórur partur av innsavnaðu spilloljuni stavar frá smyrjiolju og leggja uppskot fyri løgtingið um neyvari áseting av umhvørvisgjaldinum á smyrjioljuni.

Ein annar minniluti (Helena Dam á Neystabø) tekur støðu í tingsalinum.

136. Hvørja ávirkan hevur statsstuðulin á búskapin

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna, hvussu stóran týdning inntøkan frá tí danska statinum hevur fyri føroyingar og tann føroyska búskapin.

Kanningin skal ikki avmarkast til blokkstuðulin, men skal eisini lýsa allar veitingar uttanfyri blokkin, sum t.d. eftirlønir og tilboð, sum føroyingar undir útbúgving í Danmar taka ímóti. Kanningin skal eisini lýsa, hvussu nógv arbeiðspláss stuðulin skapar í føroyska samfelagnum. Kanningin skal leggjast fyri tingið í komandi tingsetu til kunningar.

Viðmerkingar:

Fyri bert fáum árum síðani upplivdu landsins borgarar, at teir fólkavaldu leiðararnir og hjátparfólk teirra ikki høvdu nakra hóming av, hvussu stór uttanlandsskuldin var. Aftaná neyvari kanningar gjødist bráddliga neyðugt at tvífalda uttanlandsskuldina til 8 milliardir kr. fyri at fáa hana at samsvara við veruleikan. Av tí at politikkarar, búskapar- og hagfrøðingar søgdu seg ikki verða vitandi um sonnu búskaparstøðu landsins, høvdu teir heldur ongan møguleika at stýra og at ráðgeva rætt.

Tann navnframi breski forsætisráðharrin Disraeli segði einaferð í farnu øld hesi orð í parlamentinum: "Fólksins lagna er treytað av tess upplýsing og vitan".

Tað er ikki so lítið sum hendir á, at kjarnin til trupulleikar føroyinga liggur í hesum einfalda sannleika, at upplýsing og vitan okkara um egin viðurskifti er ov vánalig, soleiðis sum skeivmetingin av uttanlandsskuldini eisini ber boð um.

Spurningurin er so, um uttanlandsskuldin er eitt eindømi, um vantandi vitan um egin viðurskifti. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jógvan Sundstein, segði tann 31. oktober 1991, at hóast danir rindaðu yvir 900 mió. kr. árliga, so hevði danska samfelagið stóran fíggjarligan og handilsligan fyrimun av tí skipanini, vit hava. "Heildarbúskaparliga viga tølini ivaleyst upp í móti hvørjum øðrum, tað ivist eg ikki í", segði Jógvan Sundstein við Dimmalætting í samband við, at Flemming Kofoed Svendsen úr Kristiliga fólkaflokkinum mælti til at skerja ríkisstudningin til Føroya.

Sambandsflokkurin heldur, at metingin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum um ríkisstuðulin er skeiv. Vit hava varhugan av, at landsstýrið stórliga yvir-

metir fyrimunirnar hjá dønum av skipanini og samstundis eisini undirmetir tað positiva árin, sum stuðulin hevur fyri búskapin. Flokkurin minnir á, at í mun til fiskivinnuna krevur ríkisstuðulin einki produktiónsapparat, og tí veruleika, og at tíðin nú er komin at lýsa hesi viðurskifti nágreiniliga.

Tað kundi borið á, at landsstýrissamgongan uftraði seg við at skifta heimastýrislógina út, um ein saklig, óvildug meting av ríkisstuðulinum var tøk áðrenn. Tað verða alt fleiri danskir politikkarar, sum ivast í, um tað er rætt at veita føroyingum stuðul. Tí neyður um at stíga varliga og verja um teir fyrimunir, sum ríkisfelagsskapurin gevur okkum. Í øllum førum er tað einki minni enn ein sorgarleikur, um tað er væntandi vitan, um hvørja ávirkan ríkisstuðulin hevur á tann føroyska búskapin, sum ger, at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin hava sett sær fyri at fremja broytingar í ríkisstøðu okkara.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 136/1991: Hvørja ávirkan hevur statsstuðulin á búskapin.

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen og Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

137. Privatisering av landsverkfrøðinginum

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka stig til at privatisera landsverkfrøðingsstovnin. Privatisering skal fara fram á tann hátt, at uppgávurnar hjá stovninum stigvist verða bodnar út til tann privata marknaðin.

Viðmerkingar:

Landsverkfrøðingurin hevur átt ein týðandi leiklut í menningini av tí føroyska samfelagnum seinastu árini. Eitt fittur partur av útreiðslunum á fíggjarlógini er á hvørjum ári farin til fløgur í infrastrukturin, m.a. berghol, vegir, havnir og lendingar, og hevur landsverkfrøðingurin staðið fyri meginpartinum av hesum virksemi. Búskaparfrøðingar mæla nú til at minka stórliga um fløgur í annað virksemi enn tað, sum beinleiðis er útflatningsskapandi. Ráðini eru ikki tey somu longur, og tað, sum samfelagið megnar av fløgum, má gerast innan høvuðsvinnuna. Hetta ger, at leikluturin hjá landsverkfrøðingsstovninum komandi mongu árini ikki verður tann sami sum áður.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur víst á, at tað búskaparliga og vinnuliga er skeivt at varðveita landverkfrøðingsstovnin í verandi líki. Felagið hevur víst á, at tað einasta rætta er at leggja landsverkfrøðingin og landsarkitektin saman í ein stovn við nøkrum heilt fáum fólkum, hvørs einasta uppgáva skuldi verið at mett og góðkent alment arbeiði.

Handverksmeistarafelagið førir fram, at alt annað virksemi hjá stovninum átti at verið privatiserað. Tað allarmesta av tí, hesin stovnur ger, er slíkt, sum náttúrligt hoyrir tí frítu vinnuni til at kappast um í einum landi, har marknaðarmekanisman setir treytir.

Vinnan vísir á, at landsins størsti entreprenørur er ein almennur stovnur. Hví ikki lata privatu vinnuna kappast um umvæling og nýgerð av vegum, og hví ikki bjóða asfaltverk, gróthrot, projektering o. a. virksemi út til tann privata marknaðin? Floksskrá Sambandsfloksins stuðlar hesi sjónarmið og leggur flokkurin tí soljóðandi uppskot til samtyktar fram:

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 137/1991: Privatisering av landsverkfrøðingunum.

Málið er lagt fram av sambandsflokkinum tann 17. mars 1992, og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Eyðun Viderø, Jógvan A. Johannessen, Jørgen Niclasen og Frank Davidsen) vísir á, at landsstýrið arbeiðir við málinum og møguleikarnar fyri at privatisera partar av tænastustovnum landsins, og setir meirilutin tí eitki uppskot fram.

Minnilutin (Terje Davidsen og Lisheth L. Petersen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eitki uppskot fram.

138. Arbeiðsskapandi tiltøk

Uppskot

til

samtyktar

Nevnd verður sett av landsstýrinum, ið fær sum arbeiðssetning, at koma við hugskotum/uppskotum um arbeiðsskapandi tiltøk.

Nevndin verður mannað við 10 limum, ið verða valdir soleiðis:

1 av Føroya Arbeiðarafelag
1 av Føroya Handverkarafelag
1 av Føroya Fiskimannafelag
1 av Føroya Íðnaðarfelag
1 valdur av Menningargrunninum
1 valdur av Búskaparráðnum
1 valdur av LFÚ
1 valdur av FUR
1 valdur av arbeiðsgevarum
1 frá Landsumsitingini, ið verður formaður.

Nevndin skal verða liðug við arbeiðið innan 1. august 1992.

Viðmerkingar:

Sambært hagtøl, so er talið av teimum, ið gerast arbeiðsleys, støðugt vaksandi.

Tølini fyri 1991 eru skelkandi. Samlaða talið av teimum, ið fingu útgoldið arbeiðsloysisstuðul í 1991 var 1001. Sama yvirlit vísir okkum, at tey í aldrinum 18 til 24 ár, 25 til 34 ár og tey í aldrinum 35 til 44 ár eru harðast rakt við ávikavist 272, 289 og 222.

Harafturímóti er talið av teimum, ið eru millum 45 og 54 ár væl lægri - 134, og tey ið eru 55 ár og eldri er 84 .

Nevndu tøl benda millum annað á, at tey, ið hava tær størstu fíggjarligu byrðarnar at bera, eru harðast rakt. Hugsað verður um tey, ið hava sett búgv, og sum hava stór og dýr lán at dragast við.

Upphæddirnar, ið eru útgoldnar í arbeiðsloysisstuðli, hava ongantíð verið so høgar, sum júst nú. Í 1990 vórðu útgoldnar tilsamans 18 miliónir kr., meðan talið fyri 1991 er komið uppá góðar 46 miliónir kr.

Lítið bendir á, at broyting kemur í á hesum øki í bráði. Nógv hevur verið talað og skrivað um at fáa samfelagshjólini at mæla aftur, men higartil hevur tað fyri størsta partin bert verið tóm orð. Í ávísum plássum í landinum, er støðan heilt

hættislig - størsti parturin av fólkinum hevur als einki at taka sær til. Hetta er ein óloyandi støða, sum fer at hava nógvar keðiligar avleiðingar við sær, um ikki vend kemur í.

Í framlagda uppskoti, verður mælt til at velja nevnd, ið skal kanna eftir, hvørjir møguleikar eru at skapa nýggj arbeiðspláss í landinum, soleiðis at talið av arbeiðsleysum minkar.

Hugsað verður fyrst og fremst um arbeiðir, ið kasta nakað av sær og bera í sær ein búskaparligan vøkstur fyri samfelagið.

Mælt verður til at velja tíggju limir í nevndina, ið umboða Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Handverkararfelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Íðnaðarfelag, Menningargrunnin, LFÚ, FUR, Bóskaparráðið og Landsumsitingina.

Tjóðveldisflokkurin mælir til, at vinnufeløgini - t. e. Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Handverkarafelag og Føroya Fiskimannfelag eiga at verða umboðað í nevndini, tí limirnir innan nevndu feløg - serstakliga í tveimum teimum fyrst nevndu feløgunum - eru serliga hart raktir av arbeiðsloysinum, og hava víst á loysnir, ið kunnu bera í sær, at nøkur av teimum, sum í dag einki hava at taka sær til, kundu fingið arbeiði aftur.

Tey ungu í aldursbólkinum 18 - 24 ár eru hart rakt, og tí er rætt, at ungdómurin verður umboðaður í tílíkari nevnd.

Føroya Íðnaðarfelag og Menningargrunnurin hava nú í mong ár viðgjørt arbeiðsskapandi ætlanir, so tey skulda við sínum drúgvu royndum havt allar fyritreytir at viðgjørt slíkt mál, ið uppskotið mælir til.

Hildið verður somuleiðis, at rætt er at hava eitt umboð fyri búskaparráðið, ið kann gera metingar um tann búskaparliga týdningin, ið møgulig uppskot frá nevndini hava. Somuleiðis verður hildið skilagott, at umboð fyri landsumsitingina verður við í nevndararbeiðnum.

Tjóðveldisflokkurin mælir til, at nevndin skal hava eina ásetta tíðarfreist at arbeiða í og til at leggja møgulig tilmæli fyri landsstýrið. Mælt verður til, at nevndin skal verða liðug við sítt arbeiði innan 1. august 1992.

Møgulig tilmæli, skulu umframt at verða løgd fyri landsstýrið, eisini verða býtt út til tingmenn, soleiðis at teir hava høvi at kunna seg um tey.

Felagsálit

í

Løgtingsmáli nr. 138/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk, løgtingsmál nr. 15/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk sum fyribyrgjan av arbeiðsloysi, løgtingsmál nr. 144/1991: Setan av nevnd í sambond við loysn av arbeiðsloysistrupulleikanum her á landi, 154/1991: Tiltøk at minka um arbeiðsloysið.

Málini eru løgd fram soleiðis: Nr. 138/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk tann 17. mars 1992 av Tjóðveldisflokkinum og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 1992 beint í arbeiðaramálanevndina, løgtingsmál nr. 15/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk sum fyribyrgjan av arbeiðsloysi tann 3. oktober 1991 av Tordi J. Nielsen og eftir 1. viðgerð tann 7. november 1991 beint í arbeiðaramálanevndina, løgtingsmál nr. 144/1991: Setan av nevnd í sambond við loysn av arbeiðsloysistrupulleikanum her á landi tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 1992 beint í arbeiðaramálanevndina og løgtingsmál nr. 154/1991: Tiltøk at minka um arbeiðsloysið lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 20. mars beint í arbeiðaramálanevndina.

Allir flokkar á løgtingi eru greiðir yvir arbeiðsloysið, sum hevur verið vaksandi - fyri at royna at byrgja fyri hesum hava fleiri flokkar sett fram næstan einsljóðandi uppskot - har øll hava tað til felags at heita á landsstýrið um at finna loysn hesum viðvíkjandi.

Arbeiðaramálanevndin er greið yvir álvarsligu støðuna og tekur undir við at nakað má gerast - hetta kemur at taka nakað av tíð - og tí verður mælt til, at arbeiðaramálanevndini verður álagt sum millumtinganevnd at arbeiða við hesum álvarsmáli og at taka inn tey í løgtingsmáli nr. 138/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk uppskot sett fram av Tjóðveldisflokkinum nevndu feløg til hoyringar og somuleiðis at hava eitt neyvt samstarv við ídnaðarnevndina og soleiðis í felag loysa hesar uppgávur og til ólavsøku leggja álitið fram hesum viðvíkjandi. Sama er galdandi fyri løgtingsmálini nr. 15/1991, 144/1991 og nr. 154/1991.

Sostatt setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

Arbeiðaramálanevndin verður millumtinganevnd, ið viðger tingmálini um arbeiðsskapandi tiltøk.

139. Broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu verður gjørd henda broyting:

Í § 4 verður sett sum nýtt stk. 3:

"Friðaður hvalur, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu og má avlívast, samb. lóg um vernd av dýrum, er ogn hjá landinum. Landsstýrinum er heimilað at gera reglur ella taka avgerð um, hvussu slíkur hvalur skal skiftast."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om hvalfangst.

§ 1.

I lagtingslov nr. 57 af 5. juni 1984 om hvalfangst foretages følgende ændring:

I § 4 indsættes som nyt stk. 3:

"Fredet hval, som strander eller kommer i lignende omstændigheder og må aflives, jvf. lov om værn af dyr, er landets ejendom. Landsstyret har hjemmel til at udfærdige regler eller træffe bestemmelse om, hvordan sådan hval skal skiftes."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í § 4 í løgtingslógini um hvalaveiðu er neyðugt at seta eitt stykki aftrat, sum hevur til endamáls at fáa greiðu á, hvat skal gerast við friðaðan hval, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu og má avlívast. Sum er, eigur hvalur, sum kemur á land, at roknast sum reki og kemur undir reglurnar fyri hetta.

Løgtingslógin um døglingsbýti er enn í gildi. Við lógini um hvalaveiðu er heimild til at taka lógina um døglingsbýti av. Sambært avgerð í altjóða hvalaveiðunevndini IWC er døglingur friðaður. Tí eigur lógin um døglingsbýti at verða avtikin. Ger døglingur landgongd og má avlívast, kann landsstýrið avgera, at reglurnar um døglingsbýti skulu vera galdandi fyri hetta.

Fyri annan hval fær landsstýrið heimild til at taka støðu í hvørjum einstøkum føri ella at gera nærri reglur um, hvussu gongdin skal vera.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 139/1991: Broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992, og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum stendur m.a.: "Løgtingslógin um døglingsbýti er enn í gildi. Við lógini um hvalaveiðu er heimild til at taka lógina um døglingsbýti av. Sambært avgerð í altjóða hvalaveiðunevndini IWC er døglingur friðaður. Tí eigur lógin um døglingsbýti at verða avtikin. Ger døglingur landgongd og má avlívast, kann landsstýrið avgera, at reglurnar um døglingsbýti skulu vera galdandi fyri hetta".

Nevndin er samd um, at um tað er neyðugt at avlíva døgling, ið hevur gjørt landgongd, eigur hann at býtast eftir galdandi siðvenju.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Jógvan Ingvard Olsen), vísir á, at sýslumenninir skifta grind og mælir til, at fyri annan hval, ið verður avlívaður, fær landsstýrið, saman við sýslumanninum á staðnum, heimild til at taka støðu í hvørjum einstøkum føri ella at gera nærri reglur um, hvussu slíkur hvalur skal skiftast. Samsvarandi hesum setir minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen) fram soljóðandi :

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður aftaná orðini "Landsstýrinum er" sett "saman við sýslumonnunum."	I § 1 sættes efter ordene "Landsstyret har" "sammen med sysselmændene."

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein triðji minniluti (Niels Pauli Danielsen) mælir til, at ein og hvør friðaður hvalur, sum má avlívast er ogn bygdarinnar og skal skiftast eftir galdandi siðvenju. Samsvarandi hesum setir minnilutin (Niels Pauli Danielsen) fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 1 verður soljóðandi: "Í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu verður gjørd hesa broyting:

Í § 4 verður sett sum nýtt stk. 3:

"Friðaður hvalur, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu og má avlívast, samb. lóg um vernd av dýrum, er ogn bygdarinnar og skal skiftast eftir galdandi siðvenju.""

§ 1 formuleres således: "I lagtingslov nr. 57 af 5. juni 1984 om hvalfangst foretages følgende ændring:

I § 4 indsættes som nyt stk. 3:

"Fredet hval, som strander eller kommer i lignende omstændigheder og nå aflives, jvf. lov om vern af dyr, er bygdens ejendom og skal skiftes efter gældende sædvane.""

140. Løgtingslóg um fuglaveiðu

Uppskot

til

Løgtingslóg um fuglaveiðu.

Kapittul 1.
Veiðirættindi.

§ 1.

Á sjónum og út at fiskimarkinum í Føroyum er veiðirætturin, sum tilskilað í hesi lóg, opin fyri einum og hvørjum, sum hevur heimarætt.

§ 2.

Uppi á landi eigur jarðareigarin veiðirættin. Almenn jørð gevur somu rættindi sum ognarjørð.

Stk. 2. Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir í tí gamla matrikuleraða bønum í tí bygd, har bjørgini liggja, fuglaveiðirættindi í

Lagtingslov om fangst/jagt af vildfugle.

Kapitel 1.
Fangst/jagtrettigheder.

§ 1.

Fangst/jagtretligheden til søs ud til fiskerigrænsen, som der er fastsat i denne lov, er fri for enhver, der har indfødsret.

§ 2.

Fangstretten på landjorden tilkommer grundejeren. Offentlig jord giver samme rettigheder som jord i privat eje.

Stk. 2. Hvor ikke særlige retsforhold medfører afvigelser, tilkommer retten til fuglefangst i fuglebjerge, urer og lignende steder ejerne af den gamle ind-

bjørgum, urðum og tílíkum fuglalendi.

Stk. 3. Har felag er, og samtykt ella fyrndarrættur ikki ger avvik, hava eigarar javnbjóðis veiðirætt.

Stk. 4. Nýtsla í felag kann samtykkjast á grannastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiðan skal minkast ella detta burtur.

Stk. 5. Veiðirættur kann í mesta lagi latast burtur 5 ár í senn.

§ 3.

Har ikki serlig rættarviðurskifti gera avvik, hava eigararnir (hagastýrini) heimild til at áscta gjald fyri veiðirætindi.

Stk. 2. Slíkar inntøkur verða býttar millum hagarnar eftir markatalinum.

Kapittul 2
Veiðitreytir

§ 4.

Landsstýrið saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins ásetur í kunngerð hvørji av hesum fuglasløgum kunnu veiðast: Havhestur, skrápur, súla, skarvur, likka, skatumási, fiskimási, valmási, svartbakur, ryta, lomvigi, álka, lundi, kráka, ravnur, kjógvi og skúgvur.

Stk. 2. Landsstýrið saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins ásetur í kunngerð, nær veiðan kann fara fram og neyvar treytir fyri, hvussu veitt verður.

Stk. 3. Landsstýrið kann saman við Løgtingsins Fiskivinnunevnd við kunngerð áseta kvotur fyri fuglaveiðu.

matrikulerede indmark i den bygd, hvor til fuglepladsen hører.

Stk. 3. På fællig, hvor ikke vedtægt eller sædvane medfører afvigelse, har ejerne lige fangstret.

Stk. 4. Vedtægt om udnyttelse af fangstret på fællig kan oprettes ved grandestævne. I en sådan vedtægt kan fastsættes, at fangstens omfang skal nedsættes eller bortfalde.

Stk. 5. Fangstret kan maximalt overdrages andre for en periode af 5 år ad gangen.

§ 3.

Hvor ikke særlige retsforhold gør sig gældende, har ejerne (haugebestyrelserne) ret til at fastsætte betaling for fangstret.

Stk. 2. Sådanne indtægter fordeles mellem haugerne efter marketallet.

Kapitel 2
Fangstbetingelser

§ 4.

Landsstyret kan sammen med Lagtingets fiskeriudvalg i bekendtgørelse fastsætte, hvilke af følgende fuglearter kan fanges: mallemuk, skråpe, sule, skarv, sildemåge, stormmåge, sølvmåge, gråmåge, svartbag, ride, lomvie, alk, lunde, krage, ravn, alm, kjove og storkjove.

Stk. 2. Landsstyret sammen med Lagtingets fiskeriudvalg fastsætter i bekendtgørelse, i hvilken periode fangsten kan foregå, og nærmere fastsatte regler for fremgangsmåden.

Stk. 3. Landsstyret kan sammen med Lagtingets fiskeriudvalg ved bekendtgørelse fastsætte kvoter for fuglefangst.

§ 5.

Veiða má bert fara fram gerandisdagar.

§ 6.

Loyvt er bert at veiða fugl við byrsu sum nærri tilskilað í § 9 og annars undir teimum treytum, sum eru nevndar í hesi lóg.

Stk. 2. Byrsa má bert nýtast til fuglaveiðu í báti.

Stk. 3. Undantikið ásetingini í stk. 2 er loyvt at skjóta hesi fuglastøg: valmási, havhestur og skurði frá ávísum plássum á landi. Landsstýrið lýsir í kunngerð, hvar hesi pláss eru.

Stk. 4. Til fuglaveiðu er bert loyvt at brúka høglbyrsu við í mesta lagi 2 skotum og í mesta lagi kalibur 12.

§ 7.

Undir lomvigabjørgum, ritubjørgum og lundaurðum/londum, skarvaurðum og við æðurvørp (sambært viðheftu kort), má eingin skjóta nærri enn 3 fjórðingar frá 1. februar til og við 31. august.

Stk. 2. Undir súlubjørgum (sí viðhefta kort) má eingin skjóta nærri enn 2 fjórðingar frá 1. februar til og við 31. oktober.

Stk. 3. Skjótast má ikki eftir fugli nærri enn 500 m frá sethúsum.

§ 8.

Landsstýrið kann við kunngerð áseta reglur um veiðiloyvi og ábyrgdartrygging í sambandi við fuglaveiðu.

§ 5.

Fuglefangst- og jagt må kun foregå på hverdage.

§ 6.

Det er kun tilladt at jage fugl med skydevåben som nærmere beskrevet i § 9, ellers efter forskrifterne i denne lov.

Stk. 2. Fuglefangst og -jagt med skydevåben må kun ske fra båd.

Stk. 3. Det er tilladt at skyde følgende fuglearter: gråmåge, mallemuk og mågeunger fra bestemte pladser på landjorden. Landsstyret meddeler i bekendtgørelse disse pladsers beliggenhed.

Stk. 4. Til fuglefangst og - jagt er det kun tilladt at benytte haglgevær med højst 2 skud og højst kaliber 12.

§ 7.

Under fuglebjerge, hvor lomvien yngler, og fuglebjerge hvor riden yngler, hundeurer og -lande, skarveur og ved ugepladser for edderfugle (jfr. vedlagte kort) må ingen skyde nærmere end 3 sømil fra 1. februar til og med 31. august.

Stk. 2. Under fuglebjerge, hvor suler yngler (se vedlagte kort) må ingen skyde nærmere end 2 sømil fra 1. februar til og med 31. oktober.

Stk. 3. Skyderi må ikke finde sted nærmere end 500 meter fra bebygget område.

§ 8.

Landsstyret kan ved bekendtgørelse fastsætte regler for fangstrettigheder og ansvarsforsikring i forbindelse med fuglefangst/jagt.

§ 9.

Landsstýrið kann við kunngerð áseta reglur um veiðihagtøl.

§ 9.

Landsstyret kan ved bekendtgørelse fastsætte regler for statistik over fangst- og jagtresultater.

Kapittul 3
Verja av villini fulgi

§ 10.

Landsstýrið kann við kunngerð friða ávís øki bæði á landi og sjógvi móti veiðu.

Kapitel 3
Beskyttelse af vildfugle

§ 10.

Landsstyret kan ved bekendtgørelse frede bestemte områder både på landjorden og på havet.

§ 11.

Allur fuglur, ið ikki er nevndur í kunngerð við heimild í § 4, er friðaður allastaðni út at fiskimarkinum.

Stk. 2. Friðað eru eisini pisur/ungar, egg og reiður.

§ 11.

Alle fugle, der ikke er nævnt i bekendtgørelse med angivelse i § 4. er fredede overalt ud til fiskerigrænsen.

Stk. 2. Fredningen omfatter tillige æg, unger og reder.

§ 12.

Tað er bannað at flyta inn og út av landinum allan livandi fugl, pisur/ungar og egg.

§ 12.

Det er forbudt at importere og eksportere alle slags levende fugle, æg og unger.

§ 13.

Ikki er loyvt at órógva fuglin við óneyðugum óljóði frá skipum, bátum, skjóting, skipsfloytum, flogførum/tyrlum ella øðrum gangi.

Stk. 2. Ikki er loyvt at órógva og at avmynda (fotografera, filma og taka upp á video) sjáldsom fuglasløg nærindis og á reiðrum teirra, t. d. lóm, smyril og vípu.

Stk. 3. Landsstýrið hevur heimild í kunngerð at banna ella minka um ferðslu, ið er til ampa fyri fuglin í ávísum økjum, bæði á landi og sjógvi.

Stk. 4. Ferðamannafeløg, stovnar og onnur, ið skipa fyri ferðum til fuglalen-

§ 13.

Det er forbudt at forstyrre fuglene med unødvendig larm fra skibe, både, skyderi, skibssirener, flyvemaskiner/-helikoptere eller anden støj.

Stk. 2. Det er forbudt at forstyrre og fotografere (eller optage på film og video) sjældne fuglearter i nærheden af og på deres reder, f. eks. lom, dværgfalk og vibe.

Stk. 3. Landsstyret har myndighed til i bekendtgørelse at forbyde eller regulere trafik, der er til gene for fuglene i visse områder, både på landjorden og på havet.

Stk. 4. Turistforeningen, institutioner og andre, der arrangerer ture til fugle-

di, hava skyldu at kunna tey ferðandi um frammanfyri standandi reglur.

§ 14.

Um ein fuglastovnur er munandi hóttur ella nervaður av skaðadýrum, t.d. rottum og kettum (útiløgukattum), kann landsstýrið skipa fyri minking ella týning av skaðadýrunum.

Kapittul 4
Skipað minking av fuglastovnum

§ 15.

Hóast ásetingarnar í hesi lóg annars kann fuglur, sum eru til stóran ampa á ávísum økjum t. d. flogahavnum, verða týndur við loyvi frá Føroya Landsstýri.

§ 16.

Um fuglastovnur er til ampa fyri aðrar fuglastovnar, kann landsstýrið hóast ásetingar í hesi lóg skipa fyri, at stovnurin verður minkaður um alt landið ella partar av landinum.

§ 17.

Undantikið ásetingunum í § 6, stk. 2 og § 7, stk. 3, kunnu kráka, ravnur og likka skjótast, tá hesi eru til ampa, eftir loyvi frá bygdarráðnum.

Kapittul 5
Vísindaligar kanningar

§ 18.

Landsstýrið hevur heimild til at geva undantaksloyvi frá reglunum ásettar í hesi lóg til kanningar við vísindaligum endamáli.

Stk. 2. Undantaksloyvi er umframt tær treytir, sum í hvørjum einstøkum føri

områder, har pligt til at gøre de rejsende bekendt med foranstående bestemmelser.

§ 14.

Såfremt en fugleart er truet eller generet af skadedyr, f.eks. rotter og katte (vildkatte), kan landsstyret iværksætte nedskæring eller udryddelse af skadedyrene.

Kapitel 4
Iværksat nedskæring af fuglearter

§ 15.

På trods af bestemmelserne i denne lov kan fugle, der er til stor gene i visse områder, f.eks. lufthavne, udryddes med tilladelse fra Færøernes landsstyre.

§ 16.

Såfremt en fugleart er til gene for andre fuglearter kan landsstyret, på trods af bestemmelserne i denne lov, iværksætte nedskæring af arten i hele landet, eller dele af landet.

§ 17.

Med undtagelse af bestemmelserne i § 6, stk. 2 og § 7, stk. 3, kan krage, ravn og sildemåge, når disse er til ulempe, skydes efter tilladelse fra bygderådet.

Kapitel 5
Videnskabelige undersøgelser

§ 18.

Landsstyret har bemyndigelse at give dispensation fra bestemmelserne i denne lov til videnskabelige undersøgelser.

Stk. 2. Dispensation er forudden de fastsættelser, som bliver bestemt i hvert

verða ásettar, treytað av, at boðað verður frá, áðrenn kanningarnar byrja, og tá tær eru av.

§ 19.

Fuglakanningar, sum órógva fuglin, harundir ringmerkingar, kunnu bert fara fram við loyvi frá Føroya Landsstýri og eftir viðmæli frá viðkomandi eigara (hagastýri).

Kapittul 6
Myndugleikarnir

§ 20.

Landsstýrinum er heimilað at gera neyvari reglur fyri at fremja tað, sum ásett er í lógini.

§ 21.

Landsstýrið kann leggja heimildir sínar á annan stovn. Landsstýrið kann áseta reglur um kæru av avgerðum hjá hesum.

Kapittul 7
Eftirlit

§ 22.

Vaktar- og Bjargingartænastan hevur á innaru og ytru landleiðini eftirlit við, at lógin verður hildin og hevur rætt til uttan rættarúrskurð at fara umborð á bátar at gera neyðugar kanningar.

Kapittul 8
Revsi- og gildisreglur

§ 23.

Uttan so at harðari revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, kemur tann undir bót, sum veiðir fugl uttan at hava veiðirætt sambært § 2, veiðir fugl við byrsu

enkelt tilfælde betinget af, at det bliver meddelt før undersøgelsen starter og da den er afsluttet.

§ 19.

Fugleundersøgelser, der forstyrrer fuglene, herunder ringmærkning, kan kun finde sted med tilladelse fra Færøernes landsstyre og efter anbefaling fra vedkommende ejer (haugebestyrelse).

Kapitel 6
Myndighederne

§ 20.

Landsstyret har bemyndigelse til at fastsætte nøjere bestemmelser for at fremme lovens indehold.

§ 21.

Landsstyret kan uddelegere sin bemyndigelse til en institution. Landsstyret kan fastsætte regler om klager over dennes afgørelser.

Kapitel 7
Tilsyn

§ 22.

Vagt- og Bjærgningstjenesten fører på de indre og ydre fiskefelter tilsyn med, at loven overholdes, og har ret til uden retskendelse at gå ombord i både for at foretage fornødne undersøgelser.

Kapitel 8
Straffe- og ikrafttrædelsesregler

§ 23.

Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning straffes med bøde den, der udøver jagt uden at have jagtrettigheder jfr. § 2, jager fugl med

í stríð við §§ 6 og 7 og sum brýtur §§ 5, 11, 12, 13 og 19.

Stk. 2. Í kunngerðum, ið verða givnar við heimild í hesi lóg, kann verða ásett sekt fyri brot á reglurnar.

Stk. 3. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum í sjálvum sær.

Stk. 4. Brot á lógina ella ásetanir við heimild í lógini verða revsað, bóast einki er veitt.

§ 24.

Málini fara fram sum løgreglumál. Tey í rættargangslógini kap. 72 (at leggja hald á) og kap. 73 (kanning) nevndu tiltøk koma tó eisini í nýtslu á sama hátt sum í málum, sum statsákæran søkir at.

§ 25.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v. m., sum hon er broytt við løgtingslógunum nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974, nr. 60 frá 5. juni 1984, nr. 33 frá 16. apríl 1986, nr. 81 frá 14. august 1987 og nr. 11 frá 24. februar 1989.

gevær i henhold til §§ 6 og 7 og som overtræder bestemmelserne i §§ 5, 11, 12, 13 og 19.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af denne lov, kan fastsættes bødestraf for overtrædelse af forskrifterne.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.

Stk. 4. Overtrædelse af loven eller dens forskrifter bliver straffet, også i tilfælde hvor der ikke er fangst.

§ 24.

Sagerne behandles som politisager. De i retsplejelovens kap. 72 (konfiskation) og kap. 73 (undersøgelse) nævnte foranstaltninger tages også i anvendelse i lighed med statsadvokatsager.

§ 25.

Denne lov træder i kraft dagen efter den er bekendtgjort.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v., som den er ændret ved lagtingslovene nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974, nr. 60 af 5. juni 1984, nr. 33 af 16. april 1986, nr. 81 af 14. august 1987 og nr. 11 af 24. februar 1989.

Viðmerkingar:

Samandráttur.

Eitt av høvuðsendamálunum er at skipa so fyri, at teir stovnar, ið tola veiðu, verða gagnnýttir á besta hátt. Landsstýrinum saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins er heimilað við kunngerð at áseta veiðitíð fyri tann fuglin, ið kann gagnnýtast. Fuglastovnur, ið er til ampa, verður minkaður við eini skipaðari týning.

Høvuðsreglan um skjóting er tann, at bert er loyvt at skjóta frá báti, tó eru undantøk gjørd til hesa grein, soleiðis at havhestur, valmási og skurði kunnu veiðast frá ávísum plássum á landi, sum vanligt er.

Minsta fjarstøða frá lomvigabjørgum, ritubjørgum og lundaurðum/londum, skarvaurðum og við æðuvørp (sambært viðhefta kort), er 3 fjórðingar og 2 fjórðingar úr súlubjørgum. Frá sethúsum má eingin skjóta nærri enn 500 metur, tó verður undantikið at skjóta kráku, ravn og likku, sum eru til ampa, eftir loyvi frá bygdarráðunum.

Landsstýrið kann haraftrat friða ávís fuglasløg móti veiðu bæði á sjógvi og landi.

Grundarlag.

Uppskotið byggir á galdandi lóg og á lógaruppskotið frá nevndini, ið landsstýrið setti at endurskoða fuglaveiðilógina í 1986. Uppskotið frá hesi nevnd varð lagt fyri løgtingið í 1988, men tað fall, tí meirilutin metti, at veiðimøguleikarnir vórðu ov nógv skerdir. Ein partur av viðmerkingunum frá 1988 eru tiknir til eftirtektar og roynt er at byggja lógina upp á sama hátt sum lóg um hvalaveiðu og fiskiveiðu á landleiðini.

Lógin verður ein rammulóg og landsstýrið og Fiskivinnunevnd Løgtingsins kunnu í kunngerð seta nærri reglur. Uppskotið hevur verið til ummælis hjá ymsum stovnum, felløgum og eintaklingum, sum vórðu mett at hava serligan áhuga í hesum máli.

Søga.

Fyrsta lógin á hesum øki er frá 9. februar 1854, og varð hon rópt "Jagtlov for Færøerne". Undan hesi lóg kenna vit ávísar friðlýsingar av fuglabjørgum v.m., ið teir, sum ognarrætt høvdu, fingu settar í verk. Friðlýsingarnar vórðu vanliga lýstar á vártingi og tær kundu t.d. vera ein friðing móti ávísum veiðihættum ella ein avmarking av rættinum til veiðu á ávísum støðum.

Í 1700-talinum vant nýtslan av byrsu upp á seg, og hetta eru nevndu friðlýsingar eisini merktar av. Klagurnar um, at skjótingin undir fuglabjørgum og aðrastaðni órógvaði fuglin og stygdi hann, førdu við sær, at fyrsta lógin um fuglaveiðu kom í gildi í 1854. Lógin heimilaði friðlýsingar, sum í rættiliga stórum tali vórðu tinglýstar, og enn tann dag í dag verða hesar gomlu friðlýsingar lisnar upp á grannastevnum.

1854-lógin fekk broytingar og uppískoytir í 1871, 1881, 1887 og 1891, til vit fingu eina nýggja veiðilóg í 1897. Ein endurskoðan aftrat førdi við sær "Lov for Færøerne om jagt og fuglefangst" í 1928. Aftur í 1954 fingu vit eina endurskoðaða fuglaveiðilóg, sum síðani er broytt í 1972, 1974, 1984, 1986, 1987 og 1989.

Kjakið um broytingar í veiðilógini seinastu 20 árini hevur serliga verið um, hvørt lomvigin skuldi friðast, og hvussu umfatandi friðingin skuldi vera. Lomvigastovnurin minkar støðugt, og kjakið heldur fram.

Veiða.

Fuglur, serliga havhestur, lundi og lomvigi, er ein týðandi partur av tí dagliga kostinum. Meðan talið á lomviga er minkað ógvuliga nógv seinastu 30 árini, er havhesturin haraftur mótí nørdur, og er nú okkara týdningarmesti fuglastovnur, sum vit veiða á ein fyrimyndarligan hátt.

Í okkara grannalondum verður dentur lagdur á at veiða tey fuglasløg, sum verpa fleiri egg um árið, og soleiðis kunnu nørast skjótt. Hetta er í nógvum førum antarfuglar, heiðafuglar og høsnafuglar, sum vit ikki hava møguleika at veiða.

Vit hava bert sjófuglin at taka av, og teir flestu verpa bert eitt egg. Sjálvt um stovnarnir eru stórir, mugu vit tí vera ógvuliga varnir við veiði og leggja dent á at veiða tann unga fuglin, meðan búfuglurin fær so góðan frið, sum til ber.

Veiða í bjørgum er fyri ein part dottin niðurfyri og er ein leivd av okkara gomlu mentan, ið eigur at verða varðveitt sum best.

Veiða við byrsu hevur framvegis stóran áhuga, serliga hjá teimum, ið ikki hava møguleika at fara í bjørgini. Farast má tó varliga fram, tí torførari er at meta um ávirkanina av byrsuni enn av veiðini, ið fer fram í bjørgunum.

Frítíðar virði.

Fuglurin hevur eisini stórt frítíðar virði. Teir stovnar, ið ikki verða veiddir til matna, skulu tí hava frið, sjálvt um t.d. smyril, ravnur, kráka og másasløgini taka ein part av teirra føði av øðrum fuglastovnum. Hetta er heilt náttúrligt, og nú flakavirkini fara betur um slógvið, og ruskplássini minka í tali, fara t.d. másastovnurin og ravnastovnurin av sær sjálvum at koma niður á eitt meira náttúrligt støði. Um so er, at onkrir av hesum stovnum verða hildnir at vera ov stórir, verður minkað um teir undir ncyvum eftirliti.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

1. kapittul

Veiðirættindi

Her eru ikki stórvegis broytingar frá galdandi løgtingslóg, men reglurnar eru gjørdar greiðari. Eigarin hevur framvegis veiðirættin, og har felag er, hava eigarar javnbjóðis veiðirætt. Samtyktir um nýtslu av veiðirætti kunnu gerast á grannastevnu, sum ásett í lóg nr. 170 frá 18. mai 1937 "for Færøerne om grandestævner m. m.", og her kann eisini gerast av, um veiðan skal minkast ella bannast.

2. kapittul

Veiðutreytir

Ad. § 4. Við hesi grein verður roynt at skipa veiðina á skynsamasta hátt, so mest fæst burtur úr teimum stovnum, sum tola veiðu. Fyri at gera lógina sinidligari at arbeiða við, ger løgtingið bert av, hvørjir fuglastovnar kunnu gagnnýtast og á annan hátt veiðast, meðan landsstýrið og Fiskivinnunevndin áseta, nær veiðan kann fara fram og neyvar treytir fyri, hvussu veitt verður.

Grundarlagið fyri, hvørjir fuglar kunnu gagnnýtast, er støddin á búfuglastovnunum. Haraftrat er hugsað um, at tey fuglasløg, sum verpa fleiri egg (másasløgini og skarvurin), tola lutfalsliga størri veiðu enn tey, sum bert verpa eitt (havhesturin, skrápurin, súlan, lomvigin, álkan og lundin). Tá ið stovnar eru í minking, sum t. d. lomviga-, álku- og lundastovnurin, er neyðugt at vera sera varin við veiðu.

Niðanfyri eru gjørdar viðmerkingar til teir einstøku fuglastovnarnar, ið kunnu gagnnýtast og skjótast, um teir eru til ampa á einhvønn hátt. Í 1981 vórðu stovnarnir av másasløgum taldir, í 1985 súlustovnurin, og í 1987 vórðu rytu- og lomvigastovnarnir taldir. Tølini fyri hinar stovnarnar eru bert leysligar metingar.

Havhestur: 600.000 pør. Sjálvt um veiðan er stór, nørist stovnurin framvegis. Hetta er einasti fuglastovnur, har veiðan kann økjast munandi.
Skrápur: 25.000 pør. Tann veiðan, ið fer fram, nervar neyvan stovnin.
Súla: 2.000 pør. Súlan er nørd nógv í Norðuratlantshavi, men í Føroyum er eingin ella bert ein lítil vøkstur. Størsti parturin av ungonum verður tikin sum grásulur, so stovnurin tolir ikki aðra veiði. Kanska hevði stovnurin ment seg skjótari, um minkað varð um veiðina.
Skarvur: 1.500 pør. Lutfalsliga nógvir skarvsungar koma undan á hvørjum ári, so stovnurin tolir eina varliga veiði. Dentur má tó verða lagdur á at veiða ungarnar og geva teimum gomlu frið.
Likka: 9.000 pør. Gomul likka verður ikki etin, men skurin er góður matur.
Fiskimási: 1.200 - 1.500 pør. Gamal fiskimási verður ikki etin, men skurin er góður matur.
Valmási: Her er gjørt eitt undantak frá reglini um at gagnnýta teir stóru búfuglastovnarnar, tí valmási eigur ikki í Føroyum, men er ferðafuglur norðaneftir. Í einstøkum plássum verða skurar av hesum slagi skotnir frá landi, tá ið teir flúgva framvið.
Svartbakur: 900-1.200 pør. Gamal bakur verður ikki etin, men baksskurin er góður matur.
Ryta: 230.000 pør. Ryta verður fleygað, serliga um borð á skipum. Elsini verða rituungar tiknir í summum plássum.
Lomvigi: Lomvigastovnurin er minkaður 75-95% seinastu 30 árini, og í 1987 var stovnurin komin niður á 175.000 pør.

Minkingin hevur ongantíð verið so stór sum seinastu árini, og stovnurin er nú neyvan støri enn 100.000 pør.
Álka: 1.000 - 5.000 pør. Føroyski álkustovnurin er so lítil, at hann ikki tolir veiðu. Álkustovnurin er helst eisini minkaður minst líka nógv sum lomvigastovnurin. Grundin til, at vit kortini loyva veiði av álku, er, at á vetri er nógv álka undir Føroyum. Meginparturin av hesum álkum koma helst úr Íslandi, men uttan iva eru føroyskar ímillum, og tá stovnurin er so lítil, er hetta vágiligt.
Lundi: 500.000 pør. Stovnurin hevur helst verið í minking í nógv ár, og seinastu 3 árini eru sera nógvar pisur deyðar.

Ad § 5.
Hetta eru somu treytir sum í verandi lóg.
Kráka: 500-1.000 pør sambært kanningum í 1981.
Ravnur: 150-350 pør sambært kanningum í 1981.
Kjógvi: 1.200-1.500 pør sambært kanningum í 1981.
Skúgvur: 250 pør sambært kanningum í 1981.

Ad stk. 3.
Um neyðugt skal verða møguligt at seta kvotur fyri, hvussu nógv kann veiðast. Her verður hugsað um bæði vaksnan fugl, pisur/ungar og egg.

Ad § 6, stk. 2:
Grundin, til at byrsa bert má nýtast til fuglaveiði frá báti, er m.a., at nógvastaðni verður skotið til máls eftir t.d. havhestum, sum flúgva framvið, uttan at teir verða tiknir upp.

Ad § 6, stk. 3:
Á nøkrum fáum plássum fer verulig veiða frá landi fram, har havhestar og skurar, ið flúgva fram við landi ella inn yvir tangar, verða skotnir til matna. Í slíkum plássum verður framvegis loyvt at skjóta frá landi, men veiðiraetthavarin má søkja um loyvi, so plássið verður skrásett.

Ad § 7, stk. 1:
Frástøðan frá lomvigabjørgum, ritubjørgum o.s.fr. er eftir galdandi lóg 3 fjórðingar (5.556 m), og er tað neyðugt framhaldandi at hava hesa fjarstøðu, um loyvt verður at skjóta ymisk fuglasløg árið runt.

Ad § 7, stk. 3:
Endamálið við hesum seinasta stykki er at geva teimum fuglum frið, sum halda til í bygdum øki, t.d. inni í havnum og firðum. 500 metur er sett sum tað stytsta mark.

Ad § 8.
Hugsanin um skjótiloyvi var eisini frammi í 1928 og 1988, tá veiðilógin var til viðgerðar í løgtingimum. Í Danmark og Noregi hevur skjótiloyvi verið kravt í nógv ár, og tað er eisini við í uppskotinum til nýggja fuglaveiðilóg í Íslandi. Í hesum londum skulu fólk standa eina lætta roynd fyri at fáa skjótiloyvi. Vanliga verður eitt lítið gjald latið fyri skjótiloyvið á hvørjum ári, sum m.a. umfatar eina ábyrgdartrygging. Harafrat tryggjar royndin, at teir, sum skjóta fugl, duga at handfara eina byrsu og kenna fuglarnar. Henda grein er tikin við, soleiðis at møguligt verður at seta reglur í verk, um hetta gerst neyðugt.

Ad § 9.
Fyri at kunna meta um stovnsbroytingar og veiðutrýstið, er ætlanin at veiðumenn einaferð á hvørjum ári boða frá, hvussu nógvan fugl teir hava veitt. Hetta er samsvarandi treytunum fyri ræning av lomvigareggum, og sama avtala er eisini gjørd við teir, ið taka grásúlur og draga lundar.

Ætlanin er, at øll veiða skal skrásetast, men enn eru ikki umstøður til at seta ætlanina í verk.

Ad § 10.
Í summum førum er tørvur á at friða ávís øki enn meira enn nevnt frammanfyri. Her verður serliga hugsað um øki, har fólk býr, og har fuglur savnast í stórum tali, t.d. til at eta ella at hvíla seg.

3. kapittul

Verja av villini fugli

Ad § 11.
Her er ongin broyting frá verandi lóg.

Ad § 12.
Her verður í fyrsta lagi hugsað um, at sjúkur fuglur ikki verður fluttur inn og í øðrum lagi at varðveita fuglastovnin, sum hann er frá náttúrunnar hond. Tað skal ikki vera loyvt, uttan serligt loyvi, at flyta inn fugl, t. d. dúgvu, havørn og hipling, við útseting fyri eyga og soleiðis broyta tað náttúrliga fuglalívið.

Ad § 13.
Broytingarnar frá verandi lóg eru, at farast skal serliga varliga um reiðrini hjá fuglum, sum eru fámentir, so fuglurin ikki hvørvur sum búfuglur. Eisini er møguleiki at banna ella minka um ferðslu í ávísum økjum fyri at verja fuglin.

Ad § 14.
Henda greinin er nýggj í fuglaveiðulógini. Heimild er frammanundan til at minka um rottur og útfløgukattar, men stórur vandi er fyri, at rottan kemur í fleiri oyggjar til stóran skaða fyri m.a. lundan og drunnhvítan.

4. kapittul

Skipað minking av fuglastovnum

Ad § 15.
Eftir galdandi lóg verða fuglar týndir, har teir eru til skaða, t.d. á flogvøllinum, alibrúkum og fóðurvirkjum. Náttúrugripasavnið umsitur loyvini.

Ad § 16.
Her verður hugsað um kráku, ravn, kjógva og skúgv, ið ikki verða gagnnýttir, men eftir galdandi lóg kunnu veiðast við tí endamáli at minka um stovnarnar ella at halda teimum niðri. Veiðan av hesum fuglum er alt ov tilvildarlig og hevur í flestu førum onga ávirkan á stovnarnar. Stovnarnir av skaðafuglum eru so stórir, at ein skipað minking kann verða framd, um teir gera ov stóran skaða. Í 1981 vóru hesir stovnar taldir, og tá vóru bert 250 skúgvapør, 1200-1500 kjógvapør, 150-350 ravnapør og 500-1000 krákupør.

Ad § 17.
Út frá teimum viðmerkingum, sum eru komnar til fuglaveiðulógina, verður mett, at tað er neyðugt at gera undantak til §§ 6 og 7, stk. 3, soleiðis at tað er møguligt at skjóta skaðafugl, her verður hugsað um kráku, ravn og likku. Fyri at fáa hesi viðurskifti skipað, skal bygdarráðið spyrjast um loyvi at skjóta skaðafugl, soleiðis at yvirlit kann fáast yvir, hvussu nógv av hesum verður skotið.

5. Kapittul

Vísindaligar kanningar

Ad §§ 17 og 18.
Mett verður, at neyðugt er við tílíkari grein fyri at kunna stýra teimum kanningum, sum fara fram á ein tílíkan hátt, at ikki fleiri felagsskapir í senn gera somu kanningar, og soleiðis at vit kunnu tryggja okkum, at vit fáa úrslitið av teimum kanningum, sum verða gjørdar, og um vit halda tað er neyðugt, at fáa møguleika at senda eygleiðarar við á tílíkar kanningarferðir.

Harumframt kann eisini hugsast, at neyðugt er at geva undantak frá regluni um skjóting uttanfyri tað tíðarskeið, tá hetta verður loyvt, og kanska eisini á friðaðum øki. Eisini kann hugsast, at neyðugt er at geva undantak fyri at flyta egg og fugl út av landinum til kanningar.

Sostatt er ætlanin við hesi grein, at viðkomandi, sum vil gera kanningar av fugli í Føroyum, skal fáa útvegað loyvi frá landsstýrinum, soleiðis at viðkomandi kann skjalprógva yvirfyri myndugleikunum, at loyvi er givið til hesar kanningar.

6. kapittul

Myndugleikarnir

§§ 19 og 20 eru vanligar heimildargreinir, ið geva landsstýrinum heimild at seta reglur í verk, soleiðis at lógin fer at virka. Eisini heimila hesar greinir, at partar av fyrisitingini og heimildunum kunnu leggjast á aðrar stovnar, t.d. Náttúrugripasavnið. Kærur um avgerðir tiknar av hesum stovnum kunnu leggjast fyri landsstýrið.

7. kapittul

Eftirlit

Eftir galdandi lóg hevur Vaktar- og Bjargingartænastan á sjónum eftirlitið við, at fuglaveiðilógin verður hildin. Hetta er torført, m.a. tí at menn, sum eru undir illgruna fyri at skjóta lomviga á sumri, kunnu siga seg skjóta ryta, havhest, líkka ella annan fugl. Um skjóting verður bannað á sumri, sum mælt til í hesum uppskoti, kunnu slíkar undanførslur ikki nýtast í hesi mest umráðandi tíðini. At Vaktar- og Bjargingartænastan hevur eftirlitið á sjónum, forðar ikki løgregluni eisini at taka bátar, ið veiða ólógliga.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 140/1991: Løgtingslóg um fuglaveiði.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og undir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at talan er um eitt sera umfatandi mál, ið eigur at fáa sera gjølliga viðgerð.

Ein samd nevnd mælir tí til, at málið fær víðari viðgerð í fiskivinnunevndini sum milluntinganevnd, og setir tí fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at álagt verður fiskivinnunevndini at arbeiða víðari við fyriliggjani máli sum milluntinganevnd og at leggja fram álit í ólavsøkutingsetuni.

141. Løgtingslóg um støðisútbúgving innan tøkni

Uppskot

til

Løgtingslóg um støðisútbúgving innan tøkni.

1. táttur
Stevnumið o. a.

§ 1.

Landsstýrinum verður sambært § 2 í rammulóg nr. 54 frá 14. februar 1979 heimilað at skipa fyri støðisútbúgving innan tøkni.

Stk. 2. Støðisútbúgvingin skal miða ímóti:

1) at menna tann einstaka næmingin persónligt og til samfelagsvitsku,

2) at menna lestrarhegni og førleika til framtíðar yrki,

3) at veita næminginum støði undir framhaldandi tøkniútbúgving.

§ 2.

Tann, sum hevur tikið fráfaringarroynd fólkaskúlans, kann verða tikin upp til støðisútbúgving innan tøkni.

§ 3.

Landsstýrið ger almennar reglur um støðisútbúgvingina.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur reglur um floksdeildtal, samstarv millum skúlar um býti av flokkum og útbúgvingum, og um upptøku av næmingum.

Lagtingslov om teknisk grunduddannelse.

Kapitel I
Formål m. v.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges i henhold til § 2 i rammelov nr. 54 af 14. februar 1979 at forestå teknisk grunduddannelse.

Stk. 2. Grunduddannelsens formål er:

1) at udvikle den enkelte elev personligt og til samfundsmæssig bevidsthed,

2) at udvikle elevens færdigheder og forudsætninger for fremtidig virksomhed,

3) at give eleven grundlag for videre teknisk uddannelse.

§ 2.

Den, som har bestået folkeskolens afgangseksamen, kan optages på teknisk grunduddannelse.

§ 3.

Landsstyret fastsætter regler om grunduddannelsen i almindelighed.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter regler om klassekvotient, samarbejde mellem skoler, om fordeling af klasser og uddannelser og om optagelse af elever.

Stk. 3. Støðisútbúgving innan tøkni fer fram á einum av landsstýrinum góðkendum yrkisskúla.

2. táttur
Skipan og innihald

§ 4.

Støðisútbúgvingin verður skipað í eindum við atliti til at lúka krøvini um upptøku til framhaldandi útbúgving innan tøkni.

Stk. 2. Støðisútbúgvingin kann verða skipað í fakøkjum sambært krøvunum til ta framhaldandi útbúgvingina eftir nærri av landsstýrinum ásettum reglum.

§ 5.

Innihaldið í støðisútbúgvingini verður skipað við atliti til stevnumiðini, ið nevnd eru í § 1, stk. 2.

§ 6.

Landsskúlaráðið góðkennir stevnumið og leiðbeinandi lesiætlanir fyri støðisútbúgvingina.

Stk. 2. Landsskúlafyrisitingin staðfestir lesiætlanirnar fyri tær einstøku lærugreinirnar við støði í teimum leiðbeinandi lesiætlanunum.

§ 7.

Næmingum, sum hava tað fyri neyðini, kann verða givin serundirvísing og annar sernámsfrøðiligur stuðul.

Stk. 2. Næmingum verða givin ráð og vegleiðing viðvíkjandi útbúgving og persónligum viðurskiftum.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur nágreiniligari reglur fyri tey í stk. 1 og 2 nevndu viðurskifti.

Stk. 3. Teknisk grunduddannelse foregår på en af landsstyret godkendt erhvervsskole.

Kapitel 2
Struktur og indhold

§ 4.

Grunduddannelsen tilrettelægges i moduler med henblik på at opfylde optagelseskravene til fortsat teknisk uddannelse.

Stk. 2. Grunduddannelsen kan tilrettelægges inden for fagområder i henhold til kravene til den fortsatte uddannelse efter nærmere af landsstyret fastsatte regler.

§ 5.

Grunduddannelsens indhold tilrettelægges under hensyntagen til de formål, der er nævnt i § 1, stk. 2.

§ 6.

Undervisningsrådet godkender grunduddannelsens formål og de vejledende undervisningsplaner.

Stk. 2. Undervisningsdirektoratet fastsætter de enkelte fags undervisningsplaner på grundlag af de vejledende undervisningsplaner.

§ 7.

Elever, der har behov for det, modtager specialundervisning og anden specialpædagogisk bistand.

Stk. 2. Elever tilbydes rådgivning og vejledning om uddannelsen og personlige forhold.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter nærmere regler for de i stk. 1 og 2 nævnte forhold.

§ 8.

Næmingar fáa prógv fyri hvørja fullførda støðiseind. Næmingar, sum gevast í útbúgvingini, hava rætt til váttan fyri framda skúlagongd.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur reglur um próvtøku fyri hvørja lærugrein sær.

§ 9.

Hevur næmingur lokið ein part av støðisútbúgvingini frammanundan, ella á annan háttnomið tann kravda kunnleikan, fatar útbúgvingin vanliga bert um tann vantandi partin av støðisútbúgvingini.

Stk. 2. Næmingur við serligum fortreytum kann sleppa undan pørtum av undirvísingini.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur reglur fyri stk. 1 og 2.

§ 10.

Landsskúlaráðið kann í serligum føri, tá ið tað ræður um at fremja útbúgvingarroyndir, víkja frá reglunum í hesum tátti.

§ 11.

Skúlin skal hava næmingarnar tryggjaðar móti skaðum, sum næmingunum kann vera fyri í skúlagongdini.

3. táttur
Ígildissetan og annað

§ 12.

Henda lóg fær gildi 1. august 1992.

§ 8.

Eleverne modtager bevis for hvert afsluttet grundmodul. Elever, der afbryder uddannelsen, har ret til dokumentation for deltagelsen i undervisningen.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter regler om bedømmelser.

§ 9.

Har en elev gennemført en del af grunduddannelsen forud, omfatter uddannelsen normalt kun den resterende del af grunduddannelse.

Stk. 2. En elev med særlige forudsætninger kan fritages for dele af undervisningen.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter regler for stk. 1 og 2.

§ 10.

Uddannelsesrådet kan i særlige tilfælde, hvis det sker for at fremme uddannelsesforsøg, gøre undtagelser fra bestemmelserne i dette kapitel.

§ 11.

Det påhviler skolen at holde eleverne forsikret mod evt. ulykker under skoleopholdet.

Kapitel 3
Ikrafttrædelse m. v.

§ 12.

Denne lov træder i kraft 1. august 1992.

Viðmerkingar:

Fyri stóran part av útbúgvingunum á tøkniøkinum hava vit onga lóggávu, og har vit hava lógir, eru tær gamlar og ótíðarhóskandi. Menningin er stór innan tøkni, og londini, vit vanliga sammeta okkum við, og sum vit samstarva við eisini á

útbúgvingarliga økinum, hava broytt skipan og hækkað stoðið í tøknidútbúgvingunum. Vit mugu tí nú fáa skilagóðar og tíðarhóskandi útbúgvingar innan tøkni.

Í nógv ár hevur verið semja um, at neyðugt er at gera nýggjar lógir og skipanir, men tað, fólk kanska hava verið ósamd um, er, hvorjar hesar nýggju skipanir og lógir skulu vera.

Útbúgvingar innan tøkni hava eisini fleiri ferðir verið til viðgerðar á tingi. Seinasta vár legði Signar Hansen fram uppskot, har álagt skuldi vera landsstýrinum at skipa so fyri, at teknisku skúlarnir í Havn og Klaksvík kundu taka upp næmingar, ið ikki høvdu fingið møguleika til at koma í handverkaraleru. Í hesum sambandi varð samtykt gjørd, har logtingið áleggur landsstýrinum at arbeiða víðari við málinum um bestu gagnnýtslu av teknisku skúlunum og at leggja lógaruppskot hesum viðvíkjandi fyri tingið eftir óhavsøku.

Seinasta heyst vóru miðnámsútbúgvingarnar til viðgerðar í tinginum, og í álitinum frá mentunar- og skúlanevndini verður í sambandi við yrkisútbúgvingar innan tøkni sagt soleiðis:

"Nevndin er samd um, at tað er bráðneyðugt at endurskoða verandi tøknidútbúgvingarskipan, í fyrsta lagi fyri at gera eina skipan, sum nøktar yrkisførleikan til føroyska vinnulívið, í øðrum lagi fyri at nøkta krøvini til eina almennt nennandi ungdómsútbúgving, og í triðja lagi, og ikki minst, fyri at menna eina skipan, sum í minsta lagi samsvarar útbúgvingarstøðið í londunum uttanum okkum. Haraftrat heldur nevndin, at ein slík skipan eigur at skapa møguleikar fyri ástoðiligum tøknidútbúgvingum."

Landsstýrið setti í august mánaði í fjør ein arbeiðsbólk at viðgera spurningar í samband við yrkisútbúgvingar innan tøkni.

Bólkurin skuldi viðgera spurningin um tørvin á leruplássum, nýtsluna av teknisku skúlunum og um skipan av yrkisútbúgvingum innan tekni í framtíðini. Í desember 1991 var bólkurin liðugur við arbeiðið, og í tilmælinum til landsstýrið verður í sambandi við nýtsluna av tekniskum skúlunum sagt, at arbeiðsbólkurin er samdur um, at teknisku skúlarnir umframt at taka sær av yrkisútbúgvingum, eisini kunnu og eiga at verða nýttir í sambandi við onnur útbúgvingarendamál.

Viðvíkjandi spurninginum um yrkisútbúgvingar innan tekni í framtíðini er arbeiðsbólkurin samdur um, at yrkisútbúgvingarnar innan tekni (handverkarútbúgvingarnar) í høvuðsheitum eiga at verða skipaðar við fyrimynd í donsku skipanini, sum kom í gildi 1. januar 1991 samkvæt lóg nr. 211 frá 5. apríl 1989. Meðan bólkurin ikki er samdur um treytirnar fyri at byrja teknisku skúlagongdina fyri yrkisútbúgvingar.

Við støði í øllum hesum samtyktum og tilmælum hevur landsstýrið arbeitt við spurningunum um yrkisútbúgvingar og aðrar útbúgvingar innan tekni. Landsskúlafyrisitingin hevur í hesum sambandi gjørt uppskot um útbúgvingar innan

tøkni. Uppskotið hevur verið sent til ummælis hjá avvarðandi stovnum og felagsskapum og eru viðmerkingar komnar inn frá flest øllum, har hesi taka undir við og mæla til, at vit skjótast til ber fáa nýggjar lógir á hesum øki.

Á fundi í Landsskúlaráðnum 9. mars 1992 var uppskot um útbúgvingar innan tøkni til viðgerðar. Landsskúlaráðið samtykti einmælt at taka undir við uppskotinum og at mæla Føroya Landsstýri til at góðkenna tað og fáa tað lagt fyri Føroya Løgting til samtyktar.

Vísandi til frammanfyri nevndu løgtingssamtyktir hevur verið arbeitt við málinum, men hóast landsstýrið kann taka undir við meginreglunum í uppskotinum, sum Landsskúlaráðið einmælt tók undir við tann 9. mars 1992, er komið til ta niðurstøðu, at tíðin er ov stutt til at fáa gjørt uppskot til løgtingslóg um yrkisútbúgvingar greitt at leggja fyri tingið í seinasta lagi 17. mars.

Landsstýrið kann eisini taka undir við øllum teimum, sum siga, at tað hevur skund at fáa gjørt nakað á hesum økinum, bæði tí at ungdóminum tørvar útbúgvingarmøguleikar, tí at teknisku skúlarnir hava nakrar møguleikar, sum ikki verða nýttir, og tí mugu tryggja, at okkara útbúgvingar eru á sama støði, sum í londunum uttan um okkum. Landsstýrið hevur tí gjørt av at leggja uppskot til løgtingslóg um støðisútbúgving innan tøkni fyri tingið nú, soleiðis at arbeiðast kann eftir hesi lóg frá 1. august 1992.

Sambært hesi lóg ber til at skipa støðisútbúgving innan tøkni í Føroyum. Sambært § 4, stk. 1 í lógaruppskotinum verður útbúgvingin skipað í støðiseind um við atliti til at lúka krøvini um upptøku til framhaldandi útbúgving innan tøkni.

Í fyrsta umfari verður skipað fyri trimum støðiseindum, sum hvør er 2 ár ella rættari 20 vikur á skúla. Men av tí at upptøkukrøvini til tær ymsu framhaldandi útbúgvingarnar ikki eru tey somu, verður ymist, hvussu nógvar eindir neyðugt er at taka. (sí hjálagda skjal 1).

Sum dømi kann nevnast, at næmingur, sum hevur lokið 1. støðiseind, kann fara undir útbúgvingina til tøkniatstøðing (TA) - (tekniskan assistent).

Annað dømi er, at treytin fyri at verða tikin inn á útbúgvingina til víðkaða tøkniroynd (VTR ella HTX) er, at 1. og 2. støðiseind er lokin.

Triðja dømi er, at tann, sum hevur tikið 3. støðiseind, lýkur treytirnar at fara inn á maskinskúla og taka 1. ársroyndina har. Viðmerkjast skal tó, at fyri at fáa vinnubræv sum maskinistur krevst siglingartíð, men henda kann takast antin áðrenn farið verður inn á maskinskúlan ella eftir 1. ársroyndina.

Fjórða dømið er, at eftir 3. støðispart ber eisini til at halda fram og fáa eina verktøkningaútbúgving, sum t.d. byggiverktøkningur ella verktøkningur sum landmátari.

Í sambandi við møguleikarnar í hesi útbúgvingarskipan skal nevnast, at til ber at byrja bæði á 1., 2. ella 3. støðiseind alt eftir, hvørjar fortreytir tann einstaki

hevur. Sum dømi kann nevnast, at næmingur við aðrari ástoðiligari útbúgving, t.d. student/HF, sum ætlar at læra til maskinmeistara, kann koma inn á 3. støðiseind.

Landsstýrið arbeiðir framhaldandi við lóggávu fyri allar útbúgvingar innan tøkni og fyrireikar lógaruppskot um yrkisútbúgving innan tøkni at leggja fyri løgtingið á ólavsøku.

Í sambandi við lógina um yrkisútbúgving innan tøkni eru enn nakrir óloystir spurningar, sum greiða má fáast á áðrenn uppskotið verður lagt fram. Ein av hesum er, hvør støðan hjá Læruráðnum og/ella yrkisútbúgvingarnevndunum skal vera.

Eisini má støða takast til, um yrkisútbúgvingar innan tøkni skulu vera ein skipan heilt fyri seg, ella um hesar skulu/kunnu samskipast við aðrar útbúgvingar innan tøkni.

Soleiðis, sum her verður skotið upp at skipa støðisútbúgvingina í einum, ber væl til at fáa eina samskipan við yrkisútbúgvingarnar, um tað verður hildið at vera rætta leiðin.

Hóast Læruráðið/Yrkisútbúgvingarnevnd ikki er við í fyriliggjandi lógaruppskoti, tí hetta er ikki eitt uppskot um yrkisútbúgvingar, so er eitt mál, ið forðar fyri, í eini komandi lóg fyri yrkisútbúgvingar innan tøkni at tryggja, at Yrkisútbúgvingarnevndir fáa sín sjálvsagda og týdningarmikla leiklut í sambandi við innihaldið í støðiseindunum.

Arbeitt verður eisini við lógaruppskotum til løgtingslóg um verktøkningsástøðara, løgtingslóg um ástøðisútbúgving innan tøkni, viðkoða tøknisoyndl (VTR ella HTX) og løgtingslóg um útbúgving til verktøkning. Í hesum sambandi skal nevnast, at fyriliggjandi uppskot er so skipað og orðað, at framhaldandi útbúgvingar innan tøkni kunnu byggja á støðisútbúgvingina, sum verður skipað eftir hesi lóg. Ætlanin er at leggja hesi lógaruppskot fyri tingið á ólavsøku.

Eitt annað stórt mál á hesum øki er lóggávan fyri teir teknisku skúlarnar. Vit hava onga lóg fyri yrkisskúlar í Føroyum og tí er hetta eitt av teimum málum, sum landsstýrið fer at arbeiða við og niðað verður ímóti at vera liðug við hetta arbeiði, so uppskot kann leggjast fyri tingið komandi heyst.

Í sambandi við lógaruppskotið um støðisútbúgving innan tøkni eru metingar gjørdar um, hvussu nógv henda skipan fer at kosta í ár, um hon verður galdandi frá 1. august og í framtíðini.

Um 48 næmingar verða tiknir inn, verða útreiðslurnar til skúlarnar í 1992 metnar til umleið 4-500.000 kr., um vit nýta regluna um at fylla flokkarnar. Við hesi skipan fer ein partur av 1. støðiseind at kosta hítið og einki, meðan tær skúlavikurnar, sum 1. støðiseind er longri enn verandi útbúgvingar koma at kosta eyka.

Útbúgvingarstuðulin er trupult at meta um, hetta velst um tal av næmingum, aldur og bústað hjá næmingunum, men mett verður, at tann økti útbúgving-

arstuðulin í 1992 verður millum 250.000 - 300.000 kr. Hvussu nógv henda skipanin kemur at kosta komandi ár, er heldur ikki lætt at siga, tí her veldst eisini um tað fer at bera til at fáa eina samskipan av øllum yrkisútbúgvingunum innan tøkni. Um gjørd verður ein samskipan av yrkisútbúgvingunu innan tøkni í framtíðini verður mett, at nýggja skipanin fer at krevja eina góða mió. kr. meira til skúlaútreiðslur. Her skal tó nevnast, at møguliga ber til at skipa so fyri, at aðrar útreiðslur av skúlunum kunnu lækkast, so tann samlaða meirjáttanin ikki verður hetta talið.

Útreiðslurnar til útbúgvingarstuðulin eru, sum frammanfyri nevnt, treytaðar av tali av næmingum, aldri og bústaði hjá hesum næmingum og sjálvsagt verður neyðugt at taka hetta upp til viðgerðar, tá ið nýggj játtan til útbúgvingarstuðul skal setast av fyri komandi ár.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad § 3, stk. 2:
Í § 3 verður landsstýrinum heimilað at gera reglur um samskifti og samstarv mill um skúlarnar við atliti at teimum serstøku viðurskiftunum, sum gera seg galdandi í Føroyum.

ad § 4, stk. 2:
Útbúgvingin verður í fyrsta umfari í trimum støðiseindum. Hvør støðiseind verður 20 vikur á skúla. Av tí, at upptøkukrøvini til tær ymisku framhaldandi tøknidútbúgvingarnar ikki eru tey somu, verður ymist, hvussu nógvar støðiseindir neyðugt verður at taka.

ad § 5:
Undirvísingin skal undir allari støðisútbúgvingini miða ímóti at geva næmingunum eina heildarfatan og fevna um bæði verkliga og ástøðiliga undirvísing við tí í hyggju, at geva næmingunum almennan kunnleika og lestrarførleika.

ad § 6:
Víst verður til § 8 og § 9 í kunngerðini um ta hægru fyrisitingina av undirvísingarverkinum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 141/1991: Løgtingslóg um støðisútbúgving innan tøkni.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 26. mars 1992 beint í mentanmar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fundir við Jógvan Hammer, Læruráðið, Petur Oluf Hansen, Landsskúlafyrisitingin og Maritu Petersen, landsstýriskvinna í skúlamálum, saman við Jákup Thorsteinsson, deildarstjóra í Tinganesi.

Sambært § 6 í lógaruppskotinum er tað Landsskúlaráðið, ið góðkennir stevnumið og leiðbeinandi lesiætlanir fyri støðisútbúgvinga, og viðari verður í stk. 2 sagt: Landsskúlafyrisitingin staðfestir lesiætlanirnar fyri tær einstoku lærugreinirnar við støði í teimum leiðbeinandi lesiætlanunum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at hóast Læruráðið/Yrkisútbúgvingarnevndin ikki er við í fyriliggjandi lógaruppskoti, tí hetta er ikki eitt uppskot um yrkisútbúgvingar, so er eitki, ið forðar fyri, í eini komandi lóg um yrkisútbúgvingar innan tøkni at tryggja, at Yrkisútbúgvingarnevndir fáa sín sjálvsagda og týdningarmikla leiklut í sambandi við innihaldið í støðiseindunum. Tá nýggj lóggáva kemur, er tað umráðandi, at samljóð verður millum lóggávurnar at lætta um tað arbeiðið, sum nú er í gongd.

Tí verður neyðugt at tá landsstýrið fyrireikar og leggur fram uppskot um yrkisútbúgving innan tøkni at § 6 í hesum lógaruppskoti verður endurskoðað við tí fyri eyga at samsvar er millum hesar lógir.

Í lógaruppskotinum eru í nøkrum fáum førum orðingarnar ikki heilt beinar í danska tekstinum og eisini er onkur regla í danska tekstinum gloppin burturúr.

Sett verður tí fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1. Í § 6. stk. 2 í donsku orðingini verður í staðin fyri "fastsætter" sett "bekræfte".
2. Í § 8, stk. 2 verður danska orðingin broytt til "landsstyret fastsætter regler om bedømmelser for hvert enkelt fag".
3. Í § 9, stk. 1 verður danska orðingin "har en elev gennemført en del af grunduddannelsen forud, eller på anden måde erhvervet den fornødne kundskab, omfatter uddannelsen normalt kun den resterende del af grunduddannelse".

Vísandi til frammanfyri standandi mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

142. Løgtingsins umboðsmaður

Uppskot

til

samtyktar

I. Álagt verður formansskapi løgtingsins at lýsa eftir at seta eitt fólk við góðum kunnleika til samfelags-, stats- og fólkarætt til at gera reglur fyri ein løgtingsins umboðsmann.

Samsvarandi úrslitinum av hesum starvi verður álagt formansskapinum at lýsa eftir og seta løgtingsins umboðsmann í starv áðrenn Ólavsøku í ár.

Viðmerkingar:

Tá tað er við at gerast dagligur kostur, at politikkarar, og serliga landsstýrismenn, verða skuldsettir fyri lógarbrot, og ongar veruligar royndir verða gjørdar fyri at reka hesar skuldsetingar aftur, verður hildið, at føroyska fólkaræðið er komið í ein ávísan vanda.

Almennir og privatir fjølmiðlar koma í heilum við dulnevndum og navngivnum ákæruum móti almenna umsitingini og landsins stýri, sum í alt ov lítlan mun letur við seg koma, men reynir at tiga hesar burtur.

Støðan er tí hon, at maðurin á gøtuni stendur rættiliga ivingarsamur um heimildirnar í mongum avgerðum, sum tiknar eru. Sama kann í ávísan mun sigast um manninngina innan tinggátt.

Hildið verður, at løgtingið, sum tað evsta valdið, ikki kann lata sær lyndað, at skiftandi landsstýris- og løgmenn tulka tingsins avgerðir eftir egnum høvdi.

Tí eigur løgtingið sum skjótast at fáa settan á stovn ein óheftan løgtingsins umboðsmann, sum kann tryggja løgtinginum og samfelagnum øllum móti skeivum og tilvildarligum avgerðum.

Fyri at byggja borð móti báru, og soleiðis ansa eftir, at tað sindrið, vit eiga eftir av føroyskum fólkaræði, verður lív lagað framyvir, heldur Tjóðveldisflokkurin, at tað er í tøkum tíma, at løgtingið og samfelagið alt fær kunnleika um og tryggleika fyri, at evsta valdið, sum er løgtingið, veruliga er evsta vald her á landi.

Víst verður eisini til tingmál nr. 17/1978, 74/1979 og 74/1980.

143. Føroysk framleiðsla og tað almenna

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at tryggja, at føroysk framleiðsla verður tikin fram um útlendska, tá talan er at keypa/ leiga/byggja fyri almennan pening.

Viðmerkingar:

Fyri knøppum ári síðan samtykt løgtingið við 29 atkvøðum fyri uppskot til samtyktar, har álagt varð landsstýrinum at tryggja, at prent- og bókbindaraarbeiði fyri almennan pening í størst møguligan mun varð gjørt her á landi.

Landsstýrið tók samtyktina til eftirtektar og sendi skriv út til almennar stovnar hesum viðvíkjandi.

Nú var væntandi at vend kom í og at prentarbeiði fyri almenna pening í størri mun fór at verða gjørt her á landi.

Tí var tað eisini sera lugstoytt at síggja fyri mánaðum síðan, har almannakunngjørt varð í tíðindablaði, at uml. 70% av lestrarilfari (bøkur v. m.) fyri almennan pening varð fyri árið 1991 prentað/virkað uttanlands.

Í veruleikanum avdúkar hetta tað, sum í stóran mun er farið fram her á landi í mong ár, nevniliga hvussu føroysk framleiðsla mátti víkja fyri útlendaskari - emtá við hjálp av føroyskum almennum peningi.

Hetta hevur verið føroyska fdnaðinum/handverkinum til stóran skaða, ja. í førum beinleiðis orsøk til, at grundarlagið undir virkjum er tikið burtur og harvið er vorðið økt um arbeiðsloysi.

Sum undanførslu fyri at keypa útlendskt hevur verið sagt, at tann útlendska vøran var bíligari og tí varð hetta valt fram um tað føroyska.

Væl kann vera, at føroyska vøran í sær sjálvari ikki altíð hevur verið kapping arfør við ta útlendsku, men so er eisini alt sagt, tí tað sum samfelagsliga hevur týdning er, hvat liggur eftir í føroyska samfelagnum, tá føroyska vøran verður tikin fram um ta útlendsku!

Her verður t.d. hugsað um føroyska virkið sum inntøkumøguleikagevandi hjá einstaklinginum (heldur enn at fáa forsorgarhjálp), at uml. helvtin kemur aftur í landskassan sum skattur, menningin av fdnaðinum/handverkinum o.s.fr.

Tá hesi viðurskifti verða tikin við í útrokningina, tá man lítil ivi verða um, hvat varð bíligari fyri samfelagið.

Henda meginregla átti at verið fylgd, tá talan er um nýtslu av almennum peningi, og hevði hetta fört við sær, at føroyski íðnaðurin/handverkið fekk rímuligt kor at virka undir.

Við almennum peningi at taka stoðli undan íðnaðinum/handverkinum má metast beinleiðis sum landaskaði og átti sjálvandi ikki at funnið stað.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 143/1991: Føroysk framleiðsla og tað almenna.

Málið er lagt fram av Tordur J. Nielasen tann 16. mars 1992, og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í íðnaðarnevndina.

Nevndin kann ikki taka undir við uppskotinum, tí tað fer at gánga beint ímóti teimum avtalum, sum eru gjørdar við útlond.

Tó vil nevndin harðliga ásanna, um almennir stovnar ikki keypa føroyskar vørur, um tær eru kappingarførar í prísi og dygd.

Aðrar fyrritøkur eiga avgjørt at hava hetta sama í huga.

144. Setan av nevnd í samband við loysn av arbeiðsloysis-trupulleikum her á landi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at seta nevnd at koma við áliti um, hvussu arbeiðsloysi her á landi sum skjótast kann minkast og hvørji neyðug tiltøk í hesum sambandi verða at seta í verk.

Viðmerkingar:

Fyri knappum 1/2 ári síðan legði undirritaði uppskot á ting, har hetta varð á landsstýrið beinanvegin at taka neyðug stig til arbeiðsskapandi virksemi kring landið.

Spell at uppskotið enn liggur í nevnd, men meiri harmiligt at arbeiðsloysis-trupulleikin hevur staðið við og versnað og at tað frá politiskari síðu hitið og einki er gjørt til tess at koma hesum skaðaeldi til livs.

Tað kann ongantið endurtakast nóg ofta, hvorjar syrgiligar avleiðingar arbeiðsloysi hevur við sær og hvussu meint mong familja kring landið er rakt av hesi orsøk.

Familjur við børnum mega fara frá húsi og heimi og ikki eru tey so fá, sum onga aðra loysn hava sæð uttan at rýma av landinum.

Nú má nakað gerast og verður tí skotið upp, at seta eina skjótt arbeiðandi nevnd við umboðum úr t.d. verkaføroyum, fiskimannafelagnum, arbeiðeiðsgevarafelagnum, kommunufelagnum, íðnaðarfelagnum v.m., sum t.d. kann arbeiða við hesum setningi fyri eygað:

"Hvussu kann sum skjótast minkast um arbeiðsloysi her á landi, og hvørji neyðug tiltøk mega setast í verk til tess at náa hetta mál."

Nevndin eigur at arbeiða við atliti til hvørjir aldursbólkar serliga eru hart raktir av arbeiðsloysinum og hvussu arbeiðsloysi annars hevur rámt tey ymisku plássini kring landi.

Eisini eigur nevndin at umhugsa lækkan av pensiónsaldrinum og stytting av arbeiðsvikuni.

Nevndin skal verða liðug við arbeiði sítt og koma við áliti til landsstýrið í seinasta lagi 3 mánaðar eftir at nevndin er sett.

Arbeiðsloysi er fyrst og fremst ein politiskt skaptur samfelagstrupulleiki og sostatt ábyrgd og avbjóðing politikkaranna og er tað tí umráðandi, at bæði samgonga og andstøða standa saman í royndini at loysa henda trupulleika.

Í hesi ásannan verður frá uppskotstillarantum enn einaferð gjørd ein roynd.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 144/1991: Setan av nevnd í samband við loysn av arbeiðsloysistrupulleikanum her á landi.

Málið er lagt fram av Tordur J. Nielasen tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 20. mars 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Vist verður til felagsálit í løgtingsmáli nr. 138/1991: Arbeiðsskapandi átøk.

145. Hjálp til alivinnuna

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast, saman við vinnuni og peningastovnunum, at virka fyri neyðugum skipaðum fíggjarkarmi um alivinnuna, og um neyðugt at leggja uppskot fyri tingið hesum viðvíkjandi.

Viðmerkingar:

At alivinnan hevur og kemur at hava ein stóran búskaparligan týdning fyri føroyska samfelagið man fáur ivast í.

Tó má ásannast, at í løtuni er alivinnan í stórum fíggjarligum trupulleikum, sum einamest kemur til sjóndar í manglandi likviditeti, sum í veruleikanum avspeglar búskaparligu kreppuna í samfelagnum.

Henda samfelagskreppa kann loysast við øktum nettoútflutningsvirði, og er tað júst her, at alivinnan hevur alstóran týdning fyri føroyska búskapin og samfelagið sum heild.

Havast eigur í huga, at alivinnan ikki er ein stuðningsvinna og hevur heldur ongantíð fingið kreppuhjálp ella veðhald.

Men støðan hjá hesi vinnu í dag er akutt, soleiðis at skilja, at neyðugt verður at veita vinnuni eina hjálpandi hond, og kann hetta gerast við, at peningur verður til fígging av rakstri tey komandi 2 - 3 árini.

Tá hugsað verður um búskaparliga týdningin av alivinnuni og tey mongu arbeiðspláss - bæði beinleiðis og óbeinleiðis - ið eru knýtt at hesi vinnu, so kann tað almenna ikki longur loyva sær at verða "tigandi áskoðari", meðan vinnan verður sindrað til miklan skaða fyri einstaklingar og samfelagið sum heild.

Tí eigur tað almenna nú, saman við vinnuni og peningastovnunum, at finna eina loysn á hesum álvarsmáli, soleiðis at ein skipaður fíggjarkarmur um alivinnuna nú verður skaptur.

Vit hava í veruleikanum ikki ráð at bíða longur og eigur tí sostatt nú beinanvegin at farast til verka í hesum álvarsmáli.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 145/1991: Hjálp til alivinnuna.

Málið er lagt fram av Tórður Niclasen tann 17. mars 1992, og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1992 beint í fdnaðarnevndina.

Unboð fyri alivinnuna vóru á fundi við nevndina. Teir førdu fram, at helst øllum kunnugt, so er alivinnan sera, sera illa fyri. Um gjøldini, sum vinnan hevur goldið fgjøgnum fleiri ár, vórðu endurrindað alivinnuni, hevði hon verið munandi betri fyri nú. Annars mældu teir til, at øll gjøld frá vinnuni til landskassan verða avtikin straks, og at neyðugt er við aðrari hjálp eisini. Eitt, sum kann gera mun, er, um heiliváguir til fiskin varð ókeypis. Vandi er fyri misnýtslu, tí eingin gevur meiri heilivág enn neyðugt.

Nevndin er kunnað um at samgongan ætlar ikki politiskt at stuðla alivinnuna við nýggjum figgjarkarmi, men at onnur tiltøk eru møgulig, sum eisini verður arbeitt við. Landsstýrismaðurin í alimálum hevur boðað frá, at eingi avgjøld skulu liggja á alivinnuni aftaná 1. januar 1993, og eisini er ætlanin í hesum árinum at minka um útreiðslurnar av ymiskum tænastum.

Út frá hesum tekur nevndin ikki undir við uppskotinum og setir eingi uppskot fram.

146. Broytingar í útvarpsgjaldsskipanini

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera neyðugar broytingar í lógini um útvarp, soleiðis, at húsarhald bert tinda gjald fyri ein radiomóttakara og at bilar og bátar undir 5 br. reg. tons sleppa undan gjaldi.

Viðmerkingar:

Lógin um útvarp heimilar at krevja og panta eftir hvørjum einasta radiotóli í landinum, og ikki munnu tey vera so fá, sum soleiðis eru rykt eftir lurtaragjaldi.

Hvussu nógv lurtaratól eru í landinum er helst torført at vita, men eingin ivi man vera um, at fleiri av hesum ongantíð eru "skráset" og sostatt heldur ongantíð kravd eftir gjaldi.

Hinvegin er tað mangt eitt húski, sum fær krav uppá bæði tvey og trý radiotól.

Sostatt er í veruleikanum talan um, at summi gjalda bert fyri tað eina, meðan onnur gjalda fyri fleiri.

Í hesum døgum rakar benda skipan nangi eitt húski meint og verður tí skotið upp, at broyta skipanina soleiðis, at lurtaragjald hjá øllum húskjum í landinum bert fevnir um tað eina tóli, og ikki sum nú fleiri - fróknað tað í bili og báti.

Ikki verður mett rímiligt heldur, at húski gjalda fyri tól í bili og báti, tá hugsað verður um ta avmarkaðu tíð hjá flest øllum, at lurta verður eftir ÚF í bili og báti.

Útvarp Føroya er stovnur í menning og er tryggur fíggjarkunnur forbreytin fyri at støðið og senditíðin kann varðveitast.

Tí kann niðurskurður í lurtaragjaldi óhugsandi fremjast uttan so, at kompenserað verður yvir løgtingsins fíggjarlóg.

Landsstýrið eigur tí beinanvegin at taka hædd fyri teim broytingum, sum eru skotnar upp, soleiðis at upphæddin, sum vegna hesa broyting gerst ein minni inntøka hjá útvarpinum, verður sett av av á fíggjarlógini fyri 1993.

Vinnur uppskotið frama slepst undan tí mannamuni, ið rakur húski kring landið - og somuleiðis fer hetta at kennast sum ein lætti hjá teim, sum í hesum døgum hava trupult at fáa endarnar at røkka saman.

Álit

í

Løgtingsmál nr. 146/1991: Broytingar í útvarpsgjaldsskipanini.

Málið er lagt fram av Tordi Nielasen tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 26. mars 1992 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og vísir á, at arbeitt verður við útvarps- og sjónvarpsspurningunum. Fyri stuttum kom fram álit um útvarps , og sjónvarps- og aðrar fjølmiðlaspurningar.

Nevndin heldur, at tað er náttúrligt, at slíkir spurningar, sum teir, ið eru í uppskoti Tordi Nielasens verða tiknir við í viðgerðina um útvarp og sjónvarp.

Ein samd nevnd tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti og setir einki uppskot fram.

147. Lækking av skattatrýstinum

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot um lækking av skattinum, ið førir til meiri virksemi og minking av arbeiðsloysinum.

Viðmerkingar:

Arbeiðsloysið vindur alt meira og meira upp á seg og er vorðin okkara størsti trupulleiki.

Arbeiðsloysið tók seg av álvara upp her á landi, tá ið skattatrýsti varð økt og bundna samansparingin varð løgd oman á skattin hjá fólki.

Síðan tá eru komin nýggj avgjøld til arbeiðsloysisgrunn, trygdargrunn og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum øll tyngja bæði vinnulív og løntakarar umanandi, soleiðis at veruliga skatta- og avgjaldstrýstið nú er umleið 60% av eini meðalinntøku.

Ein háttur at fáa samfelagshjólini aftur at mala og størri virksemi, sum kann minka um arbeiðsloysið er at lækka skattatrýstið, so at meira verður eftir hjá fólki bæði til at gera fløgur fyri og til at gjalda tænastur við.

Hesi bæði eru neyðug í einum og hvørjum sunnum samfelag.

Ein onnur aðaltreyt er hon, at tað altíð má loysa seg at arbeiða hjá fólki, og at tað eisini loysir seg at gera fløgur, sum geva ein samfelagsligan ágóða.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 147/1991: Lækking av skattatrýstinum.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Fiskaaling og Fiskivinnuflokki tann 17. mars 1992 og undir 1. viðgerð 20. mars 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen, Ingvør Vidrø og Símmbogi Arge) og ein minniluta (Lasse Klein).

Nevndin hevur hildið fund við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í liggjarmálum. Landsstýrismaðurin upplýsti fyri nevndini, at landsstýrið fyrireikar eitt lógaruppskot, sum hevur til endamáls at lækka skattatrýstið, og at hetta verður lagt fyri tingið í eykatingsetuni, sum verður í mei 1992.

Út frá frammanfyri standandi setir meirilutin einki uppskot fram í málinum og kann ikki mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki, men mælir til at bíða eftir uppskotinum frá Føroya Landsstýri.

Minnilutin (Lasse Klein) heldur tað vera av allar største týdningi at fyrireika uppskot um lækking av skattatrýstinum í Føroyum, tí er hækkað munandi síðani 1989, og tí eiga slíkar kanningar at verða gjørdar, áðrenn fíggjarlógaruppskotið fyri 1993 verður framlagt.

Grundgevingin hjá meirilutanum fyri ikki at taka undir við uppskotinum til samtyktar er tann, at landsstýrismaðurin hevur upplýst nevndini, at landsstýrið fyrireikar eitt lógaruppskot, sum hevur til endamáls at lækka skattatrýstið. Men einki verður nevnt um, at landsstýrið í staðin ætlar at seta uppskot fram um meirvirðisgjald, og at endamál landsstýrisins ikki er at fáa minni pening í landskassan, men heldur tvørturímóti, og tí kann minnilutin ikki góðtaka fráboðan meirilutans fyri annað enn politiskar snildir fyri at vinna landskassanum enn meira pening og at gera umstøðurnar hjá fólki uppaftur verri fyri í gerandisdegnum.

Minnilutin hevur einki ímóti at taka undir við, at álagt verður landsstýrinum at gera kanningar og uppskot um lækking av skattinum, ið førir til meira virksemi og minking av arbeiðsloysinum.

148. Munandi sparingar innan almennu umsitingina

gjøgnum rationalisering, effektivisering og privatisering

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinavegin at seta niður nevnd av serkønum til at kanna og koma við uppskoti á ólavsøku um, hvussu ið munandi springar kunnu fáast innan almennu umsitingina gjøgnum rationalisering, effektivisering og privatisering, har hetta er betri, fyri at tænastustøðið kann hækka.

Viðmerkingar:

Tey seinastu árini hevur nógv verið tosað um sparingar.

Hin einstaki hevur verið noyddur at spart, og virksemið á privata arbeiðsmarknaðinum er minkað munandi. Í sumtum førum er vinnulívið steðga upp, og bert

fáar nýíløgur verðu gjørdar, sum kunnu økja um arbeiðsmøguleikarnar og minka um arbeiðsloysið.

Sparingin hjá landskassanum er einamest komin til sjóndar í minkingini av studninginum til fiskivinnuna.

Bara í ár er játtanin á fíggjarlógini til fiskivinnuna minkað heilar 100 mió. kr., úr 372 mió. kr. fyri 1991 niður til 272 mió. kr. fyri 1992. Kanska verður studningurin úr landskassanum uppaftur minni, sum líður út á árið. Hin 1. mars vóru útgoldnar 14,6 mió. kr. í studningi til fiskivinnuna, íroknað studningur til keyp og góðsking av útlendskum fiski. Kortini roknar fíggjarlógin fyri 1992 við einum halli upp á 92 mió. kr.

Royndirnar higartil siga, at hallið verður munandi størri. Landskassin hevði fyri 1991 eitt hall upp á 500 mió. kr.

Tað er tí neyðugt, at sparingar eisini verða gjørdar innan hitt almenna økið, so at hallið á fíggjarlógini fæst burtur, og peningur verður til at gera tær neyðugu íløgur í tann arbeiðsskapandi útlutningsvinnu, sum er tað fíggjarliga grundarlagið hjá okkum øllum.

Í grannalondum okkara hevur tað borið til at gera munandi sparingar innan ta stóru almennu umsiting, sum her hjá okkum bara tykist at vaksa.

Kanningar hava verið gjørdar eisini her á landi, t.d. innan postverkið. Tað hevði verið áhugavert at fingið at vita, hvat sakkøna ráðgevarnir søgdu og mæltu út.

Í øðrum londum hevur loysnin viðhvørt verið at privatisera og lagt ábyrgdina út til hin einstaka, eitt slag av marknaðarbúskapi, sum tykist vinna fram í heiminum í dag. Tað er ikki heilt óhugsandi, at tað eisini kann vísa seg at vera ein leið hjá okkum at ganga fyri at fáa eina dygdargóða, skynsama og kvika tænastu.

Álit

í

Løgtingsmáli 148/1991: Munandi sparingar innan almennu umsitingina gjøgnum rationalisering, effektivisering og privatisering.

Málið varð lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinniflokki tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars 1992 beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomesen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen og Finnbogi Ísakson) vísir á, at í landsstýrinum er sett fíggjardeild av serkønum til at taka sær av øllum fíggjarspurningum. Nevndi meiriluti setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Flemming Mikkelsen) ásannar at bráneyðugt er at fremja sparingar innan almennu umsitingina, men kann ikki taka undir við uppskotinum sum tað er orðað. Minnilutin metir ikki at endamálið við sparingunum eigur at verða at tænastustøðið skal hækka.

149. Broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá.

§ 1.

Í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá verður gjørd hendla broyting:

§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"Eitt skip, sum er 100 skrásett tons brutto ella meira og 100 tons brutto ella meira, sum er útlendsk ogn, kann verða tikið upp í skráina, um:

1) føroyingur ella feløg, sum eftir § 1 í løgtingslóg um skráseting av skipum verða mett sum føroysk, reka reiðaravirki sum ein týðandi tátt og hava stóran beinleiðis ella óbeinleiðis ognarpart í útlendskum felagnum og sambært ognarpartinum týðandi ávirkan við atkvøðurætti ella líknandi, og

2) útlendska felagið hevur sett eitt umboð her á landi, sum kann taka ímóti kunnuggerðing vegna eigaran, hevur fulltrú til at handla mótvegis skrásetingarmyndugleikun-

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om Færøyska Altjóða Skipaskrá.

§ 1.

I lagtingslov om Færøyska Altjóða Skipaskrá foretages følgende ændring:

§ 1, stk. 2 affattes således:

"Et skib, som er 100 bruttoregistertons eller derover og 100 bruttotons eller derover, som er udenlandsk ejet, kan optages i registret, såfremt:

1) færinger eller selskaber, der efter § 1 i lagtingslov om registrering af skibe må anses som færøske, har rederidrift som en væsentlig aktivitet og har betydelig direkte eller indirekte kapitalhandel i det udenlandske selskab, samt i mellør af kapitalandelen en betydelig indflydelse ved stemmeret eller lignende, og

2) det udenlandske selskab har udpeget en repræsentant her i landet, som kan modtage forkyndelse af stævning på ejerens vegne, er bemyndiget til at optræde på ejerens

um, og hevur ábyrgdina av, at tær skyldur, sum hvíla á reiðarínum eftir hesi løgtingslóg, verða lýddar."

vegne i forhold til registermyndighederne, og er ansvarlig for, at de pligter, der påhviler rederiet efter denne lagtingslov, efterkommes."

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Løgtingið hevur avgreitt løgtingsmál nr. 55/1991: Føroysk Altjóða Skipaskrá og løgtingsmál nr. 78/1991: Broyting í løgtingslóg um skráseting av skipum.

Tá landsstýrið legði fyri løgtingið uppskot um broytingar í løgtingslóg nr. 9 frá 15. mars 1970 um skipaskrá, sum var framlagt um somu tíð sum FAS-lógin var til 2. viðgerð í tinginum, heitti landsstýrið samstundis á Løgtingsins Ídnaðarnevnd um møguliga at bera so í bandi, at orðingin í § 1, stk. 2 í FAS-lógini hevði eina beinleiðis tilvísing til § 1 í løgtingslóg um skráseting av skipum, fyri á tann hátt at hava eina einsljóðandi orðing av, hvat ein føroyskur skipaeigari er.

Broytingin í FAS-lógini er ikki komin við undir viðgerðini í løgtinginum og verður við hesum nýtt broytingaruppskot sett fram. FAS-lógin er ikki lýst enn, tí landsstýrið skal áseta nærri reglur um umsiting av lógini, tí kann orðingin í hesum broytingaruppskoti verða tikin við í kunngerð av lógini.

Orðingin í § 1 í hesum broytingaruppskoti útgreinar nærri, nær eitt skip verður mett sum føroyskt og treytir fyri, hvussu útlendsk feløg kunnu skráseta skip undir føroyskum flaggi. Broytingaruppskotið er sostatt greiðari og er í samsvar við § 1 í skrásetingarlógini.

150. Broyting í lógini um Húsalánsgrunnin, sethúsafígging og útgjalding av lánum

uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri Ólavsvøkutingsetuna uppskot um broyting í lógini um Húsalánsgrunnin, sum miðar ímóti, at lánini verða útgoldin, tá ið húsini eru innilokað, lánitíðin upp til 35 ár og tey fyrstu 5 árini avdráttarfrí.

Møguleiki eigur eisini at vera fyri umfígging av verandi lánum hjá fólki, sum eru komin illa fyri.

Viðmerkingar:

Tað hevur týdning fyri føroyska fólkinum at búgva í egnum húsum.

So skjótt til bar, varð farið í húsini. Oftast var bara miðhaeddin so fragt innrættað, at tað bar til at matskalfa sær, sova og gera tað mest neyðturviliga. Restin var fingin til vega so hvørt, sum torvurin og ráðini vóru til tess.

Í hesum trongu tíðum er tað trupult fyri familjur at seta egið búgv og varðveita húsini, um lánibyrðan gerst ov stór. Dagliga fregna vit um tann sorgarleik, at familjur vera heimleysar, tí at tey klára ikki at svara hvørjum sítt, eftir at landskassin fyrst hevur tikið tað, hann skal hava burtur av inntøkuni.

Landsbúskaparliga hevur tað stóra ávirkan, at so nógvur peningur tey seinastu árini er bundin í sethúsabygging.

Tað er tí neyðugt at venda aftur til gamla siðvenju at fáa egin hús uppá og gera tað møguligt hjá fólki, ið byggja, at fátt lánini frá Húsalánsgrunninum útgoldin, tá ið húsini eru innilokað.

Stuðul eigur eisini at verða veittur við longri lánitíð og avdráttarskaa.

Tað eigur eisini at bera til hjá verandi lántakarum at fáa umlagt lán sítt eftir teimum nýggju møguleikunum. Tað sama eigur at vera galdandi fyri gomul sethús.

Allar ætlanir um víðari innretting og/ella víðkan av bústovni, sum Húsalánsgrunnurin hevur lán í, skulu til góðkenningar í Húsalánsgrunninum.

Tað raðar um í dag at birta uppundir og geva tí ungu fólkunum bjartar vónir at seta seg í búgv og búleikast her á landi.

Tey, sum eru komin illa fyri í hesum ringu tíðum, eiga at verða hjápt við umfígging av verandi lánum, annaðhvørt gjøgnum Húsalánsgrunnin ella gjøgnum aðrar peningastovnar, har Húsalánsgrunnurin so eigur at víkja mest møguligt við sínum lánum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 150/1991: Broyting í lógini um Húsalánsgrunnin, sethúsafligging og útgjalding av lánum.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1992 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen,Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til álitið í løgtingsmáli nr. 151/1991.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) vísir á at skipanin við at laga lánstíðina eftir inntøkuni hjá lántakaranum var í gildi í 1979 - 1980 og virkaði væl. Minnilutin heldur, at ein umskipan av Húsalánsgrunninum eigur at verða grundaður á royndirnar frá teimum árunum. Út frá hesum setir minnilutin eitki uppskot fram.

151. Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin

Uppskot

til

Løgtingslóg um veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin uppá 110 mió. kr. ella mótvirðið av hesi upphædd í fremmandum gjaldoyra.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om garanti for lån til Huslånefonden.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for udenlandslån til Húsalánsgrunnurin på 110 mio. kr. eller modværdien af nævnte beløb i udenlandsk valuta.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

24. oktober 1991 samtykti landsstýrið, vísandi til § 5 í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um Húsalánsgrunn við seinni broytingum at geva Húsalánsgrunninum loyvi til at upptaka 110 mió. kr. í láni uttanlands.

Loyvið var treytað av, at endaligu lánstreytirnar skuldu góðkennast av landsstýrinum.

Broytingarnar í lánimarknaðinum førdu við sær, at tilboðið uppá tær 110 mió. kr., sum tá vóru í boði, fall burtur.

Nú hevur Húsalánsgrunnurin fingið eitt nýtt tilboð frá Scandinaviska Länskilda Banken í London uppá 110 mió. kr. í láni.

Rentan er LIBOR + 3/4% p.a. umframt kostnað. Mett verður, at tann effektiva rentan verður uml. 1% yvir LIBOR.

Treytin fyri at fáa lánið er, at landsstýrið landskassans vegna veitir veðhald.

Lógin um Húsalánsgrunnin gevur ikki landsstýrinum heimild at veðhalda landskassans vegna fyri lánum til grunnin. Tessvegna er neyðugt við eini serligari løgtingslóg, sum gevur landsstýrinum heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri láninum.

Vísandi til omanfyri standandi loyvir landsstýrið sær við hesum at leggja fyri tingið uppskot til løgtingslóg um veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin uppá 110 mió. kr.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 151/1991: Veðhald fyri láni til húsalánsgrunnin.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 23. mars 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Finnbogi Ísakson og Flemming Mikkelsen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað treytað av, at peningurin verður lænttur út aftur við positivum rentumarginali.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir fram, at tað er skeivt at økja um veðhaldsbyrðar landskassans, sum búskaparstøðan er, og mælir tinginum frá at samtykkja uppskotið.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 151/1991: Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og við 2. viðgerð 8. apríl 1992 beint aftur fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Finnbogi Ísakson og Flemming Mikkelsen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir fram, at tað er skeivt at økja um veðhaldsbyrðar landskassans, sum búskaparstøðan er, og mælir tinginum frá at samtykkja uppskotið.

152. Broytingar í ferðslulógini, royndarkoyrikort og avtøka av promillukoyringini

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti í ólavsøkutingsetuni um broytingar í ferðslulógini, sum taka promillukoyringina burtur og seta í verk eina skipan við royndarkoyrikorti.

Viðmerkingar:

Meðan arbeitt hevur verið við nýggjari rúsdrekkalóg, hevur ofta verið havt á lofti, at jú størri ómak ein skal gera sær fyri at fáa fatur á rúsdrekka, tess minni verður drukkið.

Hetta er eisini í samsvar við søgu okkara, og royndir aðrastaðni siga uttan undantak tað sama, men einki hevur verið sagt um forðingar, nær og hvar samfelagið á ongan hátt loyvir nýtslu av alkoholi.

Kristilig fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur hevur í stevnuskrá síni ein greiðan alkoholpolitik, sum miðar ímóti at minka munandi um nýtsluna av rúsdrekka í samljóð við samtyktirnar hjá bæði ST og Norðurlandaráðnum. Skotið verður m. a. upp, at rúsdrekka verður ikki loyvt á arbeiðsstaðnum, bæði privatum og almennum, og at almennar veitslur og móttøkur verða fríar fyri rúsdrekka. Eisini í ferðsluni eigur at verða sett fullkomið bann fyri nýtslu av alkoholi og øðrum rúsandi evnum.

So hvørt, sum samferðslukervið er vorðið útbygt, og akfar er vorðið alrarnanna ogn frá 18 ára aldri, hava vanlukkurnar vegna rúsdrekkakoyring verið so nógvar og so óhugnaligar, at flest allar bygdir og familjur í hópatali eru sera meint raktar.

Tí eigur Føroya Løgting við lóg at áseta harðastu revsing fyri rúsdrekkakoyring. Tað skal als ikki vera loyvt, og bilførari, sum doyvir sansir sínar við rúsdrekka og verður øðrum at bana, má metast sum drápsmaður, og bilur hansara sum drápsvápn.

Verandi lóg skilir millum promillukoyring og rúsdrekkakoyring. Skal lógin hava ávirkan, ið munar nakað á ferðsluhugburðin í samband við rúsdrekkakoyring, skal øll koyring omman fyri eitt ógvuliga lítið promillumark metast sum

rúskrekkakoyring, sum gjørt verður í grannalondum okkara, har promillumarkið er munandi lægri enn her heima hjá okkum.

Kanningar í útlondum vísa, at beiskar royndir her heima bera á tað sama borðið, at tað ganga eini 5 ár frá tí, at koyrikortið er tikið, til ein er so royndur í ferðsluni, at koyringin er forsvarlig.

Nú aldursmarkið við nýggju rúskrekkalógini er farið niður úr 20 tit 18 ár fyri at ogna sær rúsdrekka, man hin rætta stundin vera komin til at seta í verk skipan við royndarkoyrikorti. Hetta kann t.d. galda í 2 ár, til endaligt koyrikort verður útflýggja, um persónur hevur sýnt ein atburð í ferðsluni, sum ger hann ella hana skikkaða at koyra bil. Tí hetta er jú ikki vandaleyst.

Við at krevja rúsdrekkafría koyring hesi bæði árini, verður virðingin fyri koyrikortinum økt, samstundis sum hin ungi lærir seg hógv í øllum lívsins viðurskiftum í samband við rúsandi drykkir.

Tað er nú neyðugt hjá Føroya Løgtingi at lóggeva í samband við rúsandi drykkir á øllum økjum, har hin einstaki hevur serliga ábyrgd bæði fyri sær sjálvum, næsta sínum og umhvørvi.

Tí verður hetta uppskot til samtyktar sett fram um royndarkoyrikort og avtøku av promillukoyringini.

Sum ein avleiðing av samtyktu rúskrekkalógini fer Kristiligi fólkaflokkurin í ólavsøkutingsetuni at koma við fleiri fylgjulógaruppskotum, sum skulu bøta um tær allarringastu avleiðingar av nýggju rúsdrekkalógini, sum lættliga kann gerast ein vanlukka fyri Føroya fólk.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 152/1991: Broytingar í ferðslulógini, royndarkoyrikort og avtøka av promillukoyringini.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1992 beint til viðgerðar í rættarnevndina.

Uppskotið gongur út uppá at áleggja landsstýrinum at koma við uppskoti til broytingar í ferðslulógini. Uppskotið gongur út uppá at taka, sum tikið verður til, promillukoyringina burtur og seta í verk eina skipan við royndarkoyrikorti.

Nevndin, ið hevur viðgjørt málið, hevur undir viðgerðini havt fund við Maritu Petersen, landsstýriskonu, Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra, landfútan og varafútan. Undir viðgerðini er tað vorðið upplýst, at landsstýrið arbeiðir við broytingum í ferðslulógini, serstakliga viðvíkjandi promillukoyring og viðvíkjandi

spurninginum um nýtt føroyskt koyrikort. Nevndin mælir út frá hesum til, at málið verður sent landsstýrinum.

Annars setir nevndin einki uppskot fram.

153. Broyting í "Lov for Færøerne om Grandestævne m.m."

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í "Lov om Grandestævne m. m."

§ 1.

Í lóg nr. 170 frá 18. mai 1937 "for Færøerne om Grandestævne m. m." verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 3, verður orðingin "Lov om Jagt, Fuglefangst af 4. april 1928 § 2 og 5" broytt til: "løgtingslóg um fuglaveiðu § 2".
2) Í § 12 verður orðingin "Lov om Jagt, Fuglefangst m. v. af 4. april 1928 § 2 og 5" broytt til: "løgtingslóg um fuglaveiðu § 2".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i "Lov om Grandestævne m. m."

§ 1.

I lov nr. 170 af 18. maj 1937 for Færøerne om Grandestævne m.m. foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 3, ændres ordene "Lov om Jagt, Fuglefangst af 4. april 1928 § 2 og 5" til: "lagtingslov om fuglefangst § 2".
2) I § 12 ændres ordene "Lov om Jagt, Fuglefangst m. v. af 4. april 1928 § 2 og 5" til: "lagtingslov om fuglefangst § 2".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í uppskotinum um fuglaveiðilóg eru greinarnar um viðtøkur á grannastevnu óbroyttar, sostatt verður neyðugt at broyta orðingina í grannastevnulógini, soleiðis, at víst verður til nýggju fuglaveiðilógina.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 153/1991: Broyting í "Lov for Færøerne om Grandestævne m. m."

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mars 1992 og undir 1. viðgerð tann 24. mars 1992 beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Í viðmerkingunum til málið sigur landsstýrið: "Í uppskotinum um fuglaveiðilóg eru greinarnar um viðtøkur á grannastevnu óbroyttar, sostatt verður neyðugt at broyta orðingina í grannastevnulógini, soleiðis at víst verður til nýggju fuglaveiðilógina".

Nevndin er samd um, at hetta mál hoyrir saman við løgtingsmáli nr. 140/1991: Løgtingslóg um fuglaveiðu, ið er til viðgerðar í fiskivinnunevndini og mælir nevndin tí til, at málið verður beint í fiskivinnunevndina til víðari viðgerð. Samstundis verður víst á álit í løgtingsmáli nr. 140/1991: Løgtingslóg um fuglaveiðu. Samsvarandi hesum setir tí ein samd nevnd fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at løgtingsmál nr. 153/1991: Broyting í "Lov for Færøerne og Grandestævne m.m." fær víðari viðgerð í fiskivinnunevndini og at álagt verður fiskivinnunevndini at arbeiða víðari við málinum sum millumtinganevnd og at leggja fram álit í Ólavsøkutingsetuni.

154. Tiltøk at minka um arbeiðsloysið

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna, hvat ið gerast kann fyri at fáa talið á arbeiðsleysum niður, og leggja uppskot fyri tingið á ólavsøku um ítøkilig tiltøk, sum verða at seta í verk hesum viðvíkjandi.

Viðmerkingar:

Tey seinastu tvey árini hevur virksemið á privata arbeiðsmarknaðinum minkað í stórum, og tað hevur ført arbeiðsloysi við sær, sum tykist bara vinda upp á seg. Tølini fyri hjálp eftir forsorgarlógini fyri februar mánað eru tey størstu higartil.

Hesi køldu tøl siga frá teirri neyð, stórur partur av fólki okkara er staddur í. Myndugleikar landsins og lóggávuvald eiga at gera sítt til at fáa vend í og skapa karmar, sum fáa gongd í aftur virksemi á arbeiðsmarknaðinum. Til tess hevur Kristiligi fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur skotið upp at minka um skattatrýstið, so at fólk fær pening til at gera fløgur og gjalda tænastur við. Tað hevði fingið fleiri fólk í arbeiði.

Tað sama er við uppskoti okkara um at skatta hjún við helvtarbýti, sum hevði minkað um trýstið á arbeiðsmarknaðinum. Tað hevði eisini øktur barnastyrkur gjørt, longd barsilsorlov og løn fyri at ansa børnum heima.

Í arbeiðsloysistíðum sum okkara, er neyðugt at býta tað arbeiðið sum er og sum kann býtast.

Heldur enn arbeiðsloysisstuðul og hjálp eftir forsorgarlógini fyri einki at gera, eigur landsstýrið at gera tað møguligt hjá kommunum og øðrum almennum stovnum at fáa arbeiði gjørt, sum liggur á láni, tí eingin hevur ráð at fara undir tað, móti stuðningi úr landskassanum, sum álíkavæl rindar stóran part av forsorgarhjálpini og arbeiðsloysistuðlinum.

Eisini uppskot okkara her á tingi um at útvega altvinnumi fígging og harvið fáa fleiri arbeiðspláss til vega, er ein góður skjótur háttur at minka um talið á teimum, ið einki vita sær at gera og tí ganga arbeiðsleys.

Sparingar í almennu umsitingini fyri at fáa til vega pening til ilogur í útflutningsvinnuni, høvdu somuleiðis økt um virksemið á arbeiðsmarknaðinum, sum er neyðugt, um sleppast skal burtur úr tí støðu, vit nú eru komin í.

Ringast av øllum er at sita ella standa bendur í hupp og einki gera. Tí eiga øll uppskot um at minka um arbeiðsloysið at vera kærkomin. Kærkomnast av øllum hevði uppskot frá landsstýrinum og meirilutanum á tingi verið.

Nú er bíðað nóg leingi.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 154/1991: Tiltøk at minka um arbeiðsloysið.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 20. mars 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Víst verður til felagsálit í løgtingsmáli nr. 138/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk.

155. Frádráttir fyri fiski- og útróðrarmenn í sjálvuppgávuni

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til broytingar í skattalógini, sum taka inn aftur loyvda frádráttin í sjálvuppgávuni fyri heimstaðarsakn, útreiðslur til samskifti v. m. hjá sjómonnum, fiski- og útróðrarmonnum.

Viðmerkingar:

Byrðarnar, ið verða lagdar á herðarnar á virkandi fólki okkara á sjógvi og landi, tyngja alt meir og meir.

Inntøkurnar eru minkaðar munandi hjá teimum flestu tey seinastu árini.

Loyvdir eru nakrir frádráttir í sjálvuppgávuni so sum ferðafrádráttur, frádráttur fyri dupult húsarhald, hall v.m.

Fyrr varð fiski- og útróðrarmonnum loyvt at draga frá í sjálvuppgávuni fyri útreiðslur í samband við vinnuna á sjónum, men hesin frádráttur varð strikaður fyri nógvum árum síðan saman við eitt nú ferðafrádráttinum, ið tó seinni kom inn aftur og nú er galdandi.

Sjómenn fara ofta langar leiðir, og teir eru meira burtur frá heiminum enn so nógv onnur vinnandi fólk.

Hetta hava teir ásannað í grannalondum okkara og loyva tí ein serligan frádrátt til sjófólk fyri heimstaðarsakn. Danski fiskimálaráðharrin Kent Kirk, hevur nýliga lovað donskum sjómonnum at seta eina tílíka frádráttarskipan í verk fyri teir.

Tað er burturvið, at siglandi fólk okkara, bæði á naer , mið- og fjarleiðunu ikki eigur tey sonn rættindi til frádrátt sum aðrastaðir.

Tí verður hetta uppskot til samtyktar sett fram.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 155/1991: Frádráttir fyri fiski- og útróðrarmenn í sjálvuppgávuni.

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 17. mars 1992 og undir 1. viðgerð 20. mars 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Videroe) vísir til viðmerkingar meriluta ans í løgtingsmáli nr. 159/1991: Frádráttir í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál og setir eingi uppskot fram.

Minniliutin (Lasse Klein og Finnbogi Arge) tekur støðu í tingsalinum.

156. Frískúlalóg

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fyrireika uppskot til lóg um frískúlar í Føroyum og leggja uppskotið fyri Ólavsvøkutingið 1992.

Viðmerkingar:

Á nærum hvørjum ári hevur tikið seg upp her á landi ynski um frískúlar.

Vísast kann til ynski hjá Eftirskúlafelagnum, sum endaði við at fara til Danmarkar við skúla sínum, og sum nú ætlar at flyta úr Gienner, men ikki kann flyta til Føroya, og tí helst kemur at flyta til Norðurjútlands, sjálvt um teir mest av

øllum vildu flutt heim við skúlanum. Men her eru eingir møguleikar, sum í Danmørk, at fáa studning eftir eini lóg um frískúlar.

Eisini hava aðrir sjálvbodnir felagsskapir, bæði í Havn og suðuri í Vági, vent sær til skúlamyndugleikarnar um loyvi og stuðul til frískúla, men teir fingu ongar sømdir.

Í grannalondum okkara hava teir frískúlar, ið tað almenna stuðlar, og eina serliga lóg um frískúlar.

Í Keypmannahavn, vísti Lærarablaðið herfyri at siga frá, gongur 4. hvør næmingur í frískúla, og í øllum Danmark er talan um 20% av næmingunum, sum fáa undirvísing í frískúlum.

Kristiligi Fólkaflokkurin, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur heldur tíðina nú vera komna til, at eisini vit her á landi fara undir at fyritreika og seta í verk tílíka undirvísing.

Men fyrst er neyðugt við eini serligari lóg um frískúlar.

157. Rættur til orlov og dagpening í samband við barnsburð

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna og koma við uppskoti til Ólavsøkutingsetuna um, hvussu ið rættur til orlov í samband við barnsburð kann verða tryggjaður foreldrum. Somuleiðis verður at kanna og uppskot at gera um, hvussu ið allar kvinnur, eisini tær heimaarbeiðandi og tær tímalønta aftur kunnu fáa fulla dagpeningaupphædd í samband við barnsburð.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð, ið tryggjaði øllum kvinnum fulla dagpeningaupphædd, varð samtykt á tingi, meðan Kristiligi Fólkaflokkurin, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur hevði ahnanna- og familjumál um hendur.

Henda lóg tryggjaði øllum kvinnum fulla dagpeningaupphædd í 24 vikur, um tær fóru ikki aftur til arbeiðis teir fyrstu 6 mánaðirnar eftir barnsburð.

Tíverri sigst frá, at ikki allar kvinnur fáa frí frá arbeiðsgevara sínum nevndu 6 mánaðirnar, sjálvt um tær høvdu viljað.

Tí verður beitt á landsstýrið um at kanna, hvussu ið hesin rættur kann verða tryggjaður øllum kvinnum við lóg í samsvar við ta til eina og hvørja tíð galdandi dagpeningalóg.

Landsstýrið 1989-90 broytti dagpeningalógina, soleiðis at heimaarbeiðandi kvinnur og tímalønt ar, ið bara fáa arbeiði hálva tíð og minni út, fáa hálva dagpeningaupphædd.

Tað kemur, sum vera man, illa við í hesum arbeiðsloysistíðum, og er steinur oman á byrðu hjá teimum, ið ringast eru fyri og lítið arbeiði hava.

Tí verður hetta uppskot sett fram.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 157/1991: Rættur til orlov og dagpening í sambandi við barnsburð.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Frambuðs- og Fiskivinnuflokki tann 19. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 25. mars 1992 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Sverre Midjord, Sonnne Winther og Asbjørn Joensen) er av teirri áskoðan, at partur av fyriliggjandi uppskoti er so mikið umfatandi kostnaðarmikil, at takast kann ikki undir við hesum, og setir meirilutin einki uppskot fram.

Minnilutin (Terje Davidsen) tekur sum so undir við uppskotinum, men metir vegna fíggjarumstøður landsins, at ikki er møguligt at gjøgnumføra uppskotið. Minnilutin tekur sostatt ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

158. Broyting í forsorgarlógini, avtøka av málsviðgerðarum og núverandi málsviðgerð

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við danska sosialmálaráðið um broytingar í forsorgarlógini og avtøku av málsviðgerðarum og núverandi málsviðgerð til frama fyri yrkisviðgerð.

Viðmerkingar:

Tað hevur verið stór misnøgd við viðgerðina eftir forsorgarlógini, sum er farin fram ikki bara í Føroyum, men eisini í Danmørk og hinum norðanlondunum. Menn royna nýggjar leiðir.

Í Danmørk hevur sosialmálaráðið eina ætlan í gongd undir heitinum: "Tað er brúk fyri øllum". Hugsað er bæði um tey eldru í samfelagnum og tey, sum fáa forsorgarhjálp og verða viðgjørd av málsviðgerðarum.

Tann kommuna í Danmørk, sum er farin longst í hesi ætlan er Frederikshavn kommuna. Teir hava fullkomiliga slept tí gomlu skipanini og avtikið málsviðgerðarnar. Sosialrágevarar eru burtur og vorðnir til yrkisleiðarar. Klientarnir eru vorðnir meðarbeiðarar. Eingin fær meira pening fyri einki at gera.

Menniskjuáskoðanin, ið býr undir, er hon at ein og hvør kann nakað. Tað snýr seg tá um at fáa fólk at gera okkurt, tey kunnu, ístaðin fyri ney bara fáa "bistandshjálp". Fólk taka ábyrgdina av sínum egna lívi, sum skipanin við málsviðgerðarum lættliga tekur frá teimum.

Klientarnir gerast yrkisarbeiðarar og sosialráðgevararnir arbeiðsleiðarar. Yrkisarbeiðararnir verða so settir til ymisk arbeiði, sum er arbeiði, ið annars ikki verður gjørt, og fáa teir so pengar frá kommununi fyri tað, heldur enn fyri einki at gera.

Ein bindur seg til at hjálpa gomlu móðir síni í 4 vikur, ein annar at ansa hesum, ein triði at fara á skeið, ein fjórði at hjálpa brekaðum nakrar tímar o.s.fr.

Her hjá okkum er tað komið fyri, at neyðugt hevur verið hjá landsstýrinum at steðga Almannastovuni í at takað ábyrgdina frá fólki og á tann hátt óvyndiliga tey, so at tey hava mist alt ræði á egnu viðurskiftum sínum.

Uppskotið, ið her verður lagt fyri tingið, mælir til at ganga tað beint øvugtu leiðina og heldur stuðla fólki í at taka ábyrgdina av egnum lívi og hjálpa teimum til eina meining í tilveruni, sum tann hevur, ið hevur nakað at fara upp til um morgnarnar, nakað meir enn bara at takað ímóti olmussu frá "Almu".

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 158/1991: Broyting í forsorgarlógini, avtøku av málsviðgerðarum og náverandi málsviðgerð.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 18. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1992 beint í Almanna og Heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini partvís kunnað seg um viðurskiftini í Frederikshavn kommunu, sum víst verður til í viðmerkingunum til málið.

Nevndin metir hesa skipan verða áhugaverda, men sær tó ávís fyribrigdi, ið áttu at verið kannað nærri. Nevndin er eisini vitandi um, at landsstýrið skal hava fund við donska sosialmálaráðið um møguligar broytingar í forsorgarlógini.

Nevndin mælir frá at samtykkja uppskoti, men setur ístaðin soljóðandi

uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna hvørjir møguleikar eru at gera líkmandi skipan fyri Føroyar.

159. Frádráttur í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot um broytingar í skattalógini, sum gera tað møguligt fyri fólk at draga gávur til vælgerandi endamál frá í sjálvuppgávuni.

Viðmerkingar:

Føroyingar hava altíð verið sera gávumildir, og tað hevur ikki staðið á, tá ið fólk eru komin í neyð og skulu hava hjálp.

Eisini hava teir nógvu sjálvbodnu felagsskapirnir verið sera væl stuðlaðir í Føroyum.

Men ráðini hjá fólki til at veita stuðul er versnað nógv ta seinastu tíðina. Viljanum bagir einki, men nógv hava lítið og einki at geva, tá ið tað snýr seg um pengar. Skatturin fer við sínari helvt og væl tað hjá nógvum. Útreiðslurnar til bústað, klæðir og mat eru eisini stórur. Tá er lítið, ið loypur av til at stuðla við og geva burturav.

Í grannlondum okkara hevur tann siður leingi verið nýttur, at gávur til vælgerandi endamál er loyvdur frádráttur í sjálvúppgávuni.

Í Danmark er henda upphædd hækkað munandi fyri stuttum. Frá 1. januar 1992 er soleiðis loyvt har at draga upp til 3.000 kr. frá fyri hvønn, tá ið gávan er 3.500 kr. Hjún kunnu sostatt draga upp til 6.000 kr. frá, tá ið tey geva 7.000 kr. Henda skipan kemur øllum teimum mongu sjálvbodnum felagsskapunum sera væl við, ikki minst teimum feløgum, ið veita neyðstøddum hjálp, bæði uttanlands og innanlands, sum t.d. Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, Carita, Reyða Krossi o.ø.

Tað er einki at taka seg aftur í, at ein sovorðin frádráttarskipan í Føroyum kemur væl við hjá øllum tí sjálvbodna arbeiðinum.

Við hesum í huga verður hetta uppskotið til samtyktar lagt fyri Føroya Løgting.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 159/1991: Frádráttur í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál.

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. mars 1992 og undir 1. viðgerð 20. mars 1992 beint í skattanevndina.

Í uppskotinum verður mælt til, at landsstýrið ger uppskot um broytingar í skattalógini, sum gera tað møguligt hjá fólki at draga gávur til vælgerandi endamál frá á sjálvuppgávuni.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm, Johannesen, Eyðun Videro og Jørgen Niclasen) kann ikki taka undir við uppskotinum og vísir á, at síðani 1978 hevur verið roynt at avmarka frádráttirnar á sjálvuppgávuni mest møguligt. Meirilutin vísir eisini á, at samgongan hevur sett sær fyri at fremja ein botnfrádrátt í staðin fyri at nýta fleiri ymiskar frádráttir á sjálvuppgávuni.

Meirilutin vísir somuleiðis á, at ein frádráttur á sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamát merkir, at skattgjaldarin, sum letur gávuna, fær hinar skattgjaldararnar at rinda helmingin.

Hesum kann meirilutin ikki taka undir við og út frá hesum setir meirilutin einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Lasse Klein) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

160. Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna

Uppskot

til

Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna.

§ 1.

Lógin viðvíkur ábyrgdini hjá løgmanni og hinum landsstýrismonnunum fyri teirra embætisførslu.

§ 2.

Reglurnar í almenna partinum í borgarligu revsilógini eru galdandi.

§ 3.

Hvør landsstýrismaður hevur ábyrgdina av teimum avgerðum, ið hann hevur tikið viðvíkjandi teimum málsøkjum, sum honum eru latin upp í hendi at umsita.

§ 4.

Tá landsstýrið á fundi hevur tikið eina avgerð, hevur einhvør landsstýrismaður, sum hevur tikið undir við avgerðini, ábyrgdina av henni, og er hetta eisini galdandi, um landsstýrismaður á annan hátt hevur verið við til at fremja, at avgerðin er vorðin tikin.

§ 5.

Tá reglurnar í borgarligu revsilógini um meðvirkni til eitt lógarbrot verða nýttar, skal ein landsstýrismaður verða mettur at hava medvirka til gerðina hjá einum undirmanni, tá:

Lagtingslov om landsstyresmænds ansvarlighed.

§ 1.

Loven angår lagmandens og de andre landsstyresmænds ansvar for deres embedsførelse.

§ 2.

Borgerlig straffelovs almindelige del finder anvendelse.

§ 3.

Hver landsstyresmand har ansvaret for de afgørelser, som han har truffet vedrørende de sagsområder, han har fået tildelt at administrere.

§ 4.

Ansvar for en på landsstyremøde truffet beslutning påhviler enhver landsstyresmand, der har vedtaget beslutningen, og det samme er gældende hvor en landsstyresmand, på anden måde har medvirket til beslutningens tilblivelse.

§ 5.

Ved anvendelsen af borgerlig straffelovs regler om ansvar for medvirken til en lovovertrædelse skal en landsstyresmand anses for medvirkende til en underordnets handling, når:

1) hann hevur verið vitandi um, at gerðin fór at verða framd, og hann hevur latið vera við at royna at forða hesum,
2) gerðin hevur verið eitt neyðugt ella náttúrligt miðal til at seta í verk eina avgerð, sum landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av,
3) hann, við ikki í rímuligan mun at hava fört eftirlit og áseta reglur, hevur virkað fyri, at gerðin er vorðin framd.

1) han har været bekendt med, at den pågældende handling ville blive foretaget, og har undladt at søge dette hindret,
2) handlingen har været et nødvendigt eller naturligt middel til gennemførelse af en beslutning, for hvilken landsstyresmanden er ansvarlig,
3) han har fremmet handlingens udførelse ved ikke i rimeligt omfang at føre tilsyn og fastsætte instrukser.

§ 6.

Landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað, ella av grovum ósketni, skúgvar til viks tær skyldur, sum áliggja honum sambært løgtingslóg um umboðsvald Føroya, ella lóggávuni annars, ella starvsinnihaldi hansara.

Stk. 2. Ásetanin í stk. 1 er eisini galdandi, um so er, at landsstýrismaður á landsstýrisfundi ella í løgtinginum gevur skeivar upplýsingar, ella um hann, tá landsstýrið ella løgtingið viðgerð eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri landsstýrisins ella tingsins meting av málinum.

§ 6.

En landsstyresmand straffes, hvis han forsætligt eller af grov uagtsomhed tilsidesætter de pligter, der påhviler ham efter lagtingslov om Færøernes forvaltning eller lovgivningen i øvrigt eller efter hans stillings beskaffenhed.

Stk. 2. Bestemmelsen i stk. 1 finder anvendelse, såfremt en landsstyresmand giver lagtinget urigtige eller vildledende oplysninger eller under lagtingets behandling af en sag fortier oplysninger, der er af væsentlig betydning for tingets bedømmelse af sagen.

§ 7.

Revsingin eftir § 6 er bót, hefti ella fongsul upp til 2 ár.

Stk. 2. Er brotið gjørt av ósketni, er revsingin bót ella hefti.

Stk. 3. Bøturnar verða ásettar eftir reglunum um dagbøtur í borgarligu revsilógini.

§ 7.

Straffen efter§ 6 er bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

Stk. 2. Er forholdet begået af uagtsomhed, er straffen bøde eller hæfte.

Stk. 3. Bødestraf fastsættes efter borgerlig straffelovs regler om dagbøder.

§ 8.

Ásetaninar í § 7 eru bert galdandi, um

§ 8.

Bestemmelserne i § 7 gælder kun, så-

ikki harðari revsing er heimilað í aðrari lóggávu.

§ 9.

Ábyrgd landsstýrismanna fyrnast sambært §§ 93-95 í borgarligu revsilógini. Fyrningarfreistin er tó aldrin styttri enn 5 ár.

§ 10.

Viðvíkjandi endurgjaldsábyrgd í sambond við gerðir landsstýrismanna eru galdandi tær vanligu reglurnar um endurgjald fyri skaða, sum persónur í landsins tænastu hevur gjørt.

§ 11.

Landsstýrið ella løgtingið ger av, um viðurskifti viðvíkjandi embætisførsluni hjá einum landsstýrismanni skulu latast Føroya Landfúta til kanningar og møguliga ákæru.

Stk. 2. Føroya Landfúti avger, um ákæra skal reisast við kravi um revsing og/ella endurgjald.

§ 12.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

fremt strengere straf ikke er hjemlet i den øvrige lovgivning.

§ 9.

Landsstyresmænds strafansvar forældes efter borgerlig straffelovs §§ 93-95. Forældelsesfristen er dog i intet tilfælde mindre end 5 år.

§ 10.

Med hensyn til erstatningsansvar i anledning af landsstyresmænds handlinger gælder de almindelige regler om erstatning for skade forvoldt af personer i landets tjeneste.

§ 11.

Landsstyret eller lagtinget afgør, om forhold vedrørende en landsstyresmands embedsførelse skal overlades Landfogeden på Færøerne til efterforskning og mulig tiltale.

Stk. 2. Landfogeden på Færøerne afgør, om der skal rejses tiltale med krav om straf og/eller erstatning.

§ 12.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Eftir § 5 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýriskipan Føroya í sermálum verður ábyrgd landsstýrismanna ásett við løgtingslóg.

Sjálvt um liðin eru meira enn 42 ár síðan heimastýriskipanin kom í gildi, er enn ongin lóg gjørd um ábyrgd landsstýrismanna.

Eftir § 5 í stýrisskipanarlógini verður ásett, at landsstýrið stendur til svars fyri umsitingini av sermálum, og eftir § 9 í løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya hevur hvør landsstýrismaður yvirfyri løgtinginum ábyrgd av at røkja tað umboðsvald og ta umsitan, sum teimum er latin upp í hendi, beint og forsvarliga.

Sjálvar fylgjurnar av, at ásetingarnar í stýrisskipanarlógini og lógini um umboðsvald Føroya ikki vóru fylgdar, skuldu sum áður nevnt ásetast í serligari løgtingslóg.

Løgtingsgrannskoðararnir hava í skrivi dagfestum 22. september 1989 til løgmann mælt til, at fastur lógarkarmur verður gjørdur fyri embætisførðslu landsstýrismanna og stovnsleiðaranna.

Fyriliggjandi lógaruppskot er gjørt við donsku lógini um ministaraábyrgd sum fyrimynd, men av tí at landsstýrið er eitt sokallað kollegiestýri, hevur verið neyðugt at gjørt serlig frávik.

Til tær einstøku greinirnar skulu gerast fylgjandi viðmerkingar:

ad § 1.
Í hesi grein verður øki lógarinnar ásett. Eftir hesi lóg kunnu landsstýrismenn bert átalast fyri ikki at hava røkt teirra embætisskyldu sum landsstýrismenn. Skulu teir átalast fyri onnur viðurskifti, má tað vera eftir lóggávuni annars.

ad § 2.
Her verður ásett, at reglurnar í almenna partinum í borgarligu revsilógini eru galdandi. Hesar reglur kunnu serliga hava týdning um talan er um roynd ella medvirkan.

ad § 3.
Í hesi grein verður ásett, at hvør landsstýrismaður einsamallur hevur ábyrgdina av teimum avgerðum, sum hann hevur tikið. Her verður hugsað um avgerðir, ið ikki eru tiknar á landsstýrisfundi. Eftir stýrisskipanarlógini § 6, stk. 1, verða viðgjørd á landsstýrisfundi øll uppskot, ið landsstýrið leggur fyri løgtingið og annars allar týdningamiklar avgerðir. Minni týdningarmikil mál kunnu landsstýrismenn sostatt avgreiða, uttan at leggja tey fyri landsstýrisfund.

ad § 4.
Í grein verður ásett, at einhvør landsstýrismaður, sum á landsstýrisfundi hevur tikið undir við eini avgerð, eisini hevur ábyrgdina av henni. Um ein landsstýrismaður ikki tekur undir við eini avgerð, má hann biðja um at fáa hetta ført til gerðabókina. Eisini ein landsstýrismaður, sum á einhvøn annan hátt hevur medvirkað til, at ein avgerð er vorðin tikin, uttan at hetta er gjørt á formellum landsstýrisfundi hevur ábyrgd av avgerðini.

Nógv mál skulu eftir galdandi lóggávu viðtakast bæði av landsstýrinum og av løgtingsins fíggjarnevnd, marknaðarnevndini ella fiskivinnunevndini. Tað at mál eisini er góðkent av t. d. fíggjarnevndini, frítekur ikki landsstýrismennirnar fyri teirra ábyrgd. Fíggjarnevndarlimirnir hava hinvegin onga ábyrgd av teirra luttøku í málsviðgerðini, smbr. §§ 156 og 157 í revsilógini.

Men mett verður, at rætturin vanliga fer at leggja størstu ábyrgdina á tann landsstýrismannin, sum umsitur málsøkið.

ad § 5.
Her verður ásett, nær ein landsstýrismaður kann revsást fyri at hava medvirkað til lógarbrot hjá einum embætismanni.

Útgangsstøðið eru reglurnar í revsilógini um medvirkni, men verða her bert drignar fram tríggjar umstøður, ið serliga kunnu koma upp á tal.

ad § 6, stk. 1.
Henda grein svarar í høvuðsheitinum til reglunar í §§ 155-157 í borgarligu revsilógini. Sambært hesi grein er møguleiki fyri at revsa landsstýrismannin fyri at fremja vansketni í starvi sínum sum landsstýrismaður.

ad § 6, stk. 2.
Ein ábyrgd yvirfyri løgtinginum fylgir longu av stk. 1, men er víddin av ábyrgdini nágreinað her.

ad § 7.
Her verður revsingin ásett.

ad § 8.
Her verður ásett, at revsiásetaninar í hesi lógini bert eru galdandi, um ikki harðari revsing er heimilað í aðrari lóggávu. Her verður t. d. hugsað um reglurnar í kap. 16 í revsilógini um brotsverk í almennari tænastu ella starvi, har sum revsirammuan er hægri enn 2-ára fongsul.

ad § 9.
Her verður ásett, at fyrningarfreistin er sambært reglunum í §§ 93-95 í revsilógini, tó soleiðis, at hon aldri er styttri enn 5 ár. Sostatt er fyrningarfreistin aldrin úti fyrrenn nýval til løgtingið hevur verið.

ad § 10.
Við hesum verður ásett, at endurgjaldsábyrgdin ikki fylgir reglunum um revsing, har landsstýrismaður ikki kann verða revsaður, um hann hevur handlað við lítlum ósketni. Eftir hesum kunnu sostatt eisini gerðir gjørdar við lítlum ósketni viðføra endurgjaldsábyrgd.

ad ∫ 11, stk. 1.
Eftir hesum er tað landsstýrið ella løgtingið sum taka stig til, at málið verður kannað, og møgulig ákæra verður reist við at senda eina áheitan til Føroya Landfúta, um at kanna málið og møguliga reisa ákæru. Er ein landsstýrismaður samstundis løgtingsmaður, galda reglurnar í § 24 í stýrisskipanarlógini, um at ein løgtingsmaður, meðan tingið situr, ikki kann átalast uttan tingsins samtykt.

ad § 11, stk. 2.
Landfútin avger einsamallur, um ákæra skal reisast við kravi um revsing og/ella endurgjald. T.v.s. at tað eisini kann setast fram krav um endurgjald einsamalt.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 160/1991 Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 5. apríl 1991 og var eftir 1. viðgerð 10. apríl beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin viðgjørdi málið og kom til ta niðurstøðu, at nevndini tørvaði meiri tíð til viðgerðina, og mælti nevndin tí løgtinginum til at samtykkja, at nevndin skuldi vera millumtinganevnd í málinum. Hetta varð samtykt 24. apríl 1991.

Endamálið við lógaruppskotinum er at fastleggja ábyrgd landsstýrismanna við lóg, hetta er gjørt sambært lóg um stýrisskipan Føroya í sermálum frá 13. mai 1948, har ásett verður í § 5, at ábyrgd landsstýrismanna eigur at verða ásett við løgtingslóg. § 5 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum ásetir eisini, at landsstýrið stendur til svars fyri umsitingini av sermálum, og í § 9 í løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya verður ásett, at landsstýrismaður yvirfyri løgtinginum hevur ábyrgd av at røkja tað umboðsvald og ta umsiting, sum honum er latið upp í hendur beint og forsvarliga.

Hóast hesar ásetingar hevur enn eingin lóg um ábyrgd landsstýrismanna verið í gildi í Føroyum, og tað er til tess at bøta um hetta, at landsstýrið hevur lagt uppskotið fyri løgtingið. Eisini hava løgtingsgrannskoðararnir í skrivi 22. september 1979/80 mælt til, at fastur lógarkarmur verður gjørdur fyri embætisførslu landsstýrismanna og stovnsleiðaranna. Landsstýrið upplýsir í viðmerkingunum, við donsku lógini um ministaraábyrgd sum fyrimynd, men av tí at landsstýrið er eitt sokallað kollegialstýri, hevur verið neyðugt at gjørt serlig frávik. Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri landsstýrið og við løgfrøðing í fríari vinnu.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Birgir Danielsen, Bjarni Djurholm, Lisbeth L. Petersen og Signar Hansen) tekur undir við uppskotinum, burtursæð frá § 11, og hevur hesar viðmerkingar:

Skotið verður upp, at reglan um, at løgtingið, t.v.s. at ein meiriluti í løgtinginum avger, um ein sak skal latast Føroya landfúta til kanningar, verður broytt soleiðis, at tað ikki longur er meirilutin, t.v.s. løgtingslimir umboðandi eina ver-

andi samgongu, sum burturav hevur avgerðarættin í hesum máli, men at andstøðan í ein ávísan mun fær ávirkan á slík álvarsmál.

Endamálið við hesi broyting er at tryggja samfelagið móti lógarbrotum, framdum av eini samgongu umboðað av einum meiriluta á Føroya løgtingi.

Samstundis verður miðað ímóti at avmarka eina møguliga misnýtslu av hesi reglu við at krevja eitt ávíst minstamark fyri undirtøku frá andstøðuni. Hetta minstamark er ásett til 1/3 av samlaða tingmannatalinum, sum er í tráð við tað tal, sum nýtt verður í grundlóg ríkisins í samband við verju av minnilutaáhugamálum, jfr. § 42, stk. 1 og 7 og § 73, stk. 2 Eisini er talið á einum hóskandi og rímiligum støði, tá havt verður í huga søguliga floksbýtið og lutfalsligu javnvágina millum samgongu og andstøðu innan fyri karmarnar á føroysku heimastýrislógini. Smáflokkar eru hervið útihýstir frá at nýta nevndu reglu sum amboð í politiska virksemi sínum, eins og talan í flestum førum skal vera um eina breiða semju millum fleiri flokkar í andstøðu, um tílík álvarsom stig skulu verða tikin. Hervið verður mett, at skipanin hevur fingið innbygt ta javnvág og harmoni, sum skal til fyri, at hon skal tæna sínum endamáli og verða útint við neyðugum varsemi og fyriliti.

Tað er av alstórum prinsippiellum týdningi, at henda broyting verður framd í lógaruppskotinum, tá tað fyri ein og hvønn er eyðsæð, at lógin í verandi líki als ikki tænir sínum endamáli nevniliga at verja almenningin móti lógarbrotum og misnýtslu av heimildum hjá teimum ráðandi, antin hetta so verður framt av einum sokallaðum kollektivum stýri ella av einstaklingum.

Av royndum vita vit, at ein samgonga umboðað av einum meiriluta í løgtinginum, hevur samanfallandi áhugamál við sitandi landsstýri og tískil hevur ilt við at viðgera mál viðvíkjandi egnum partamonnum sakliga og objektivt.

Fyri at tryggja samfelagið og harvið borgaran móti møguligari valdsmisnýtslu og lógarbrotum, er tað tískil av avgerandi týdningi, at minnilutin innan fyri ávísar karmar fær møguleika til at seta neyðugar kanningar í verk, um væl undirbygdur illgruni er um óregluliga framferð hjá teimum ráðandi.

Havast skal í hesum sambandi í huga, at tað er ein onnur avmarking innbygd í lógina, nevniliga at málið bert kann "reisast" av løgtinginum, men at tað framhaldandi er ákæruvaldið, sum avger, hvørt ákæra skal setast í verk ella ikki.

Metir ákæruvaldið, sum sakkønur stovnur í lógarmálum, at áheitanin og skuldsetingarnar eru grundleysar, verður ikki farið víðari við málinum, sum harvið fellur burtur. Tá tað fyri rættartrygdina og álitið á okkara parlamentarisku demokratisku skipan er umráðandi, at nevnda broyting verður sett í verk, verður hervið staðiliga mælt til, at rættarnevndin tekur undir við hesum uppskoti.

Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 11 verður orðað soleiðis:

"Landsstýrið ella í minsta lagi 1/3 av limum løgtingsins, gera av, um viður skifti viðvíkjandi embætisførsluni hjá einum landsstýrismanni skulu latast Føroya Landfúta til kanningar og møguliga ákæru.

Stk. 2. Ákæruvaldið avger, um ákæra skal reisast við kravi um revsing og/ella endurgjald."

§ 11 affattes således:

"Landsstyret eller minimum 1/3 af lagtingets medlemmer bestemmer, om forhold vedrørende en landsstyremands embedesførelse skal overlades Færøernes Landfoged til undersøgelse og eventuel anklage.

Stk. 2. Anklagemyndigheden bestemmer, om anklage skal rejses med krav om straf og/eller refusion."

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

161. Vegir og lendingar

Samferðslunevndin hevur viðgjørt tær o. u. 200 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

A.

I: Vegir

Á fíggjarløgtingslógini eru settar av undir gr. 1301, 1305 og 1309 108,5 mió. kr. til vegagerðir, umsiting av landsvegunum o. a.

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram sojóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra - harumframt til brýr, ferulegur o. a. 91.501.650 kr.
Bundið í ikki nýttumjáttanum 12.310.850 kr.
Til niðanfyri nevndu arbeiði 4.687.500 kr.
108.500.000 kr.

Kommuna	**til**	**Uppskot** 3/4 av kr.
Fugloyar:	– Uppdyrkingarveg norður í Vatnsdal á Kirkju	75.000
	– Uppdyrkingarveg uppi í Króki í Hattarvík	75.000
Svínoyar:	– Veg á Gundavali	150.000
Viðareiðis:	– Dalavegin	150.000
Hvannasunds:	– Vegagerð til skúlan á Fossanesi	150.000
Klaksvíkar:	– Veg til Ánagjógv	150.000
Kunoyar:	– Veg norður í Hús	150.000
Mikladals:	– Umgerð av dyrkingarvegnum frá bygdarportrinum og út á Glaðingarstein	75.000
	– Umgerð og nýgerð av dyrkingarvegnum á Trøllanesi	75.000
Elduvíkar:	– Liðugtgjørdan veg úr landsvegnum o. f. bygdina Elduvík	50.000
	– Búsetingarveg í Funningsfirði	50.000
	– Liðugtgerð av vegnum frá kirkjugarðinum í Elduvík	50.000
Fuglafjarðar:	– Vegagerð/byggibúning á Kambsdali	100.000
	– Vegin til Laxá á Hellunum	50.000
	at flyta	1.350.000

		flutt	1.350.000
Leirvíkar:	–	Útstykking av sethúsagrundum inni á Høgabø	150.000
Gøtu:	–	Íbindingarveg í landvegin úr Syðrugøtu	75.000
	–	Veg framvið ídnaðarøkinum í Gøtudali við íbinding í landsvegin	75.000
Runavíkar:	–	Landbúnaðarveg/uppdyrkingarveg Yðstagerði í Lamba	50.000
	–	Vegin til kirkjugarðin í Rituvík	50.000
	–	Veg yvir Hjallahaga, teymur úr vegnum yvir á Glyvradal	50.000
Nes:	–	Vegin niðan á Svangaskarð	150.000
Skála:	–	Búsetingarveg frá Óla Petersen og suðureftir	150.000
Sjóvar:	–	Uppdyrkingarveg í Morskranesi	50.000
	–	Útstykkingarveg úti á Hálsi á Strondum	100.000
Sunda:	–	Útstykking á Oyri	75.000
	–	Útstykking omanfyri Kræklingavík	75.000
Gjáar:	–	Útstykkingarveg í bygdini	100.000
	–	Vegabrúgv um Hulduheyggin og vegagerð eystur á Fløtur	50.000
Funnings:	–	Brúgv um Stórá	75.000
	–	Bygdarvegir	75.000
Haldórsvíkar:	–	Veg eftir Bakkanum, Tjørnuvík	75.000
	–	Bygdaveg í Haldarsvík	75.000
Hvalvíkar:	–	Veg til leguhúsið í Nesvík	75.000
	–	Uppdyrkingarveg í Streymnesi	75.000
Hósvíkar:	–	Útstykkingarveg	150.000
		at flyta	3.150.000

		flutt	3.150.000
Kollafjarðar:	–	Vegagerð í samband við húsabygging	150.000
Kvívíkar:	–	Ovara veg í Leynum	75.000
	–	Vegur Steinagerði - Úlvsá	75.000
Vestmanna:	–	Vegagerð í Mikkarnið	150.000
Argja:	–	Dyrkingarveg í Syðradali	75.000
	–	Ábøtur á veg í Norðradali m. a. vegin til smoltstøðina	75.000
Kirkjubøar:	–	Útstykkingarvegir á Velbastað og í Kirkjubø	150.000
Hests:	–	Liðugtgerð av kirkjugarðsvegnum	100.000
Nólsoyar:	–	Ábøtur á bygdavegirnar	150.000
Sandavágs:	–	Nýgerð av Nesavegnum	75.000
	–	Nýgerð av vegi út á Trøð	75.000
Miðvágs:	–	Veg til ídnaðarøkið úti á Dal	100.000
	–	Veg í sambandi við byggibúgving á Kirkjabø	50.000
Sørvágs:	–	Meirjáttan til liðugtgerð av vegi í Úttriðingsbønum	150.000
Sands:	–	Veg norðan og eystan í Sands Vatn	50.000
	–	Veg til Søltuvíkar	50.000
	–	Veg til Skálsafjórðingin	50.000
Skopunar:	–	Útstykkingarveg í Gerðinum í Skopun	75.000
	–	Ringvegin úr Gerðinum oman til havnarøkið	75.000
Skálavíkar:	–	Brúnna um Stórá	100.000
	–	Vegin til rættina á Heiðarhaganum	50.000
Húsavíkar:	–	Uppdyrkingarveg í Dali	50.000
	–	Vegagerð í Húsavík	100.000
		at flyta	5.200.000

		flutt	5.200.000
Skúvoyar:	– Dyrkingarveg Undir Lítladalsbrekku		150.000
Hvalbiar:	– Breiðkan og lutvíst nýgerð av vegi frá Krógv og vestur til Hvalbiar skúla		50.000
	– Vegagerð í Rókatrøðini í Nesi, Hvalba		50.000
	Framhald av dyrkingarvegi eystur í eystara bøin í Sandvík		50.000
Tvøroyrar:	– Veg í Heiðunum - Froðba-Tvøroyri		150.000
Hovs:	– Breiðkan av vegi í bygdini		150.000
Porkeris:	– Vegin niðan á Dal		150.000
Vágs:	– Útstykkingarveg á Gjógvarábø		150.000
Sumbiar:	– Veg út á Túgvurnar		75.000
	– Veg út á Rakfløtt		75.000
			6.250.000

3/4 av 6.250.000,- = 4.687.500,- kr.

II
Lendingar

Játtanir fyri fíggjarárið 1992, sum samtyktar eru áður, eru hesar:
(Har einki er tilskilað, er studningurin 75% av nevndu upphæddum)

Kommuna	**til**		**Upphædd**
Fugloyar:	Trøllagjøgv í Hattarvík og lendingavegur á Kirkju (2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt		200.000
Svínoyar:	Bátahyl í Glógvansurð (5. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	95% av	700.000
	Bátahyl við Gjógvansurð (2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	95% av	400.000
Viðareiðis:	Lendingina í Eiðsvík (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð		100.000

Komminna	Til	Upphædd
Hvannasunds:	Leinging av atløgubryggjuni undir flakavirkinum í Norðdepli (5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	400.000
Klaksvíkar:	Bátahavnina á Borðoyarvík (6. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	650.000
	Bátabrúgvar, asfaltering, ljós, vatn við bátah. á Borðoyarvík (5. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	400.000
	Atløgubryggju og øki til alarar í Haraldssundi (3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
	Bryggju og øki til alarar í Haraldssundi (2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	200.000
Kunoyar:	Bátahavn í Haraldssundi (6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	150.000
	Bátahavn í Haraldssundi og grótkast undir kirkjugarðinum (3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	400.000
	Bátahavn í Haraldssundi (2. ársgjaldi av 5 ára játtan) í gerð	300.000
Oyndarfjarðar:	Dekksbátahavn (6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	250.000
Fuglafjarðar:	Smábátahavn (6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
	Umvælan av pieri í "báta- og skipahavnini" (2. ársgjald av 2. ára játtan) ikki bygt	100.000
Leirvíkar:	Ábøtur á flotbrýrnar og bátahylin, vegna brimskaða (2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	400.000
Gøtu:	Bátahyl undir Gøtueiði (6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Trý arbeiði í og við bátahylin í Norðagøtu (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt)	100.000
	Liðugtgerð av brimverju í Syðrugøtu (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Runavíkar:	Báthyl og leidingarveg á Bakka á Glyvrum (6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	200.000

Kommuna	Til	Upphædd
Runavíkar:	Lendingina í Rituvík	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahylin á Glyvrum	
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	100.000
	Bátahylin á Glyvrum	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
	Gomlustøð í Lamba	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
	Bátahylin á Glyvrum	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000
	Lendingina í Rituvík	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	50.000
	Lendingina í Lamba	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	50.000
	Lendingina í Rituvík	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	200.000
Nes:	Dekksbátahavnina og bátadrátt í Oyrunum	
	(6. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	250.000
	Brimskaða á verjugarðin og dýping av bátah.	
	í Oyrunum (5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	400.000
	Brimskaða á verjugarðin í Oyrunum	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	200.000
	Bátahavn inni í Oyrunum á Toftum	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	400.000
	Deksbátahavnina inni í Oyrunum	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	300.000
Skála:	Bátabyl á Skálafirði, molhøvd, dýping av	
	bátahyli á Skála	300.000
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	300.000
	Framhald av bátahyli í Skálafirði og bátahyli	
	á Skála (4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	300.000
	Liðugtgerð av bátah. á Skála og bátahyli í	
	Skálafirði (3. ársgjald av 6. ára játtan) í gerð	400.000
Sjóvar:	Lendingina á Morkranesi	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	100.000

Kommuna	Til	Upphædd
	Atløgusíða o. a. í bátahyli á Selatrað	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	100.000
	Bátahavn á Selatrað	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	300.000
	Bátahylin og havnalagið á Selatrað	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000
Sunda:	Bátahylin á Oyrabakka	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Grótkastið úti á Oyri	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	250.000
	Brimskaða á grótkastið á Oyri	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	500.000
	Kaiøkið við lendibrúnna við Norðskála	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
Eiðis:	Bátahavn við Ljósá	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	150.000
	Brimverju á Eiðismøl og bátabryggja v. m. Norðís	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Lendingina við Ljósá	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	100.000
Funnings:	Lendingina í Funningi	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	100.000
Hvalvíkar:	Betongdekk o. a. á kaiøkið	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	300.000
	Liðugtgerð av bátahylinum	
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt	200.000
Hósvíkar:	Atløgubryggju fram við vegnum í bátahylinum í Hósvík v. m.	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
Kollafjarðar:	Leinging av ytra armi o. a. í bátahyli við Sjógv	
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	150.000

Kommuna	Til		Upphædd
	Veg til havnina s.f. Oyruna		
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		150.000
	Bátahavn á Signahø		
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð		300.000
	Bátahylin við Sjógv, atløgusíðu v.f.		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð		100.000
	Liðugtgerð og asfaltering av lendi við báta-havnina við Sjógv		
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt		250.000
Vestmanna:	Báthylin Inni á Fjørð		
	(6. ársgjald av 7 ára játtan) bygt		200.000
	Bátahylin í Vestmanna		
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		500.000
	Verjugrót um pierin á Fitjum - pierin v. f.		
	bátahylin (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		300.000
Tórshavnar:	Víðkan av bátahylinum á Bíggjarstøð í Kalbak		
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt		300.000
	Gerð av útróðrar- og egningarstøð c.f. Viðarnes		
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt		300.000
Argja:	Framhald av bátahavnarbeiðinum á Argjum		
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt		1.000.000
	Hækking og styrking av brimgarðinum		
	á Argjum (4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		200.000
	Bátahavn á Argjum		
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		500.000
	Liðugtgerð av brimverjugarðinum á Argjum		
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		600.000
Kirkjubøar:	Leinging av brimgarðinum o .a. á Velbastað		
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		200.000
Ilests:	Útbygging av nýggja havnarlagnum		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	95% av	500.000
	Ískoyti til báta- og dekksbátahavn sum er í gerð		
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	95 % av	600.000

Kommuna	Til		Upphædd
Nólsoyar:	Brimverju millum Hørgina og Eiðið (5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		200.000
Sandavágs:	Bátahavn (6. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		800.000
	Bátahavn (5. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		1.000.000
	Bátahavn (3. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		250.000
Miðvágs:	Víðkan um bátahylin (6. ársgjald av 7 ára játtan) ikki bygt		150.000
	Víðkan um bátahylin (5. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		300.000
Sørvágs:	Bátahylin (4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		100.000
	Bátahylin í Sørvági vegna stormskaða (3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		50.000
Sands:	Atløgusíða til bátar (6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		200.000
	Veg til havnina og báta- og dekksbátahavn (3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		500.000
Skopunar:	Træbryggjuna við flakavirkið (2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð		200.000
Húsavíkar:	Lending á Skarvaskeri (6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		300.000
	Bátahavnina (5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt		300.000
	Bátahyl í Húsavík (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		400.000
	Lendingararbeiði á Skarvaskeri (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt		200.000
Skúvoyar:	Bátahyl (5. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð	95% av	800.000
	Bátahylin (4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	95% av	800.000
	Bátahylin (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	95% av	800.000

Kommuna	Til		Upphædd
	Bátahylin		
	(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	95% av	600.000
Hvalbiar:	Bryggjuna í Sandvík		
	(7. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		200.000
	Leingjan av bryggjuni í Sanvík		
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		350.000
	Leinging av bryggjuni í Sandvík		
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		200.000
Tvøroyari:	Lendingina í Øravík		
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		200.000
	Bátahyl undir Tvørábakka og bátahyl		
	í Trongisvági (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt		400.000
Fámjins:	Brimverju og brimskaða		
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		75.000
	Brimverju og leinging av brimgarðinum		
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		100.000
	Ábøtur á lendingarvegin		
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt		100.000
Hovs:	Bátabryggju til fiskaalarar		
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		200.000
	Kaiplass til fiskaalarar og planering av øki		
	til bátadrátt (3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		200.000
	Bátadrátt (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð		100.000
Sumbiar:	Brimskaða o. a. í Pollinum		
	(6. ársgjald av 7 ára játtan) í gerð		300.000
	Atløgusíðu til bátar, planering o. a. í Lopra		
	(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		100.000
	Pollin, bátahavn, brim- og bakkaverju		
	(5. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt		500.000
	Bátahyl í Lopra		
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		100.000
Sumbiar:	Bakkaverju í Sumba		
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð		100.000

Kommuna	Til	Upphædd
	Bakkaverju í Sumba	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Tilsamans 75% av	24.425.000
	- 95% av	5.200.000
	Tilsamans	29.625.000
	=	18.318.750
	=	4.940.000
	Tilsamans	23.258.750

Yvirlit í sambandi

við

Lendingarjáttanir og - grunn

Játtað frammanundan fyri 1992 til lendingar		23.258.750 kr.
Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31.12. 1991		47.534.659 kr.
		70.793.409 kr.
f grunni pr. 31.12.1991:	47.084.237 kr.	
Játtað á fíggjarlógini fyri 1992	26.300.000 kr.	73.384.237 kr
Til góðar		2.590.828 kr.

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Kommuna	til		Studningsjáttan (Har einki er tilskilað, er studningurin 75% av upphæddini) kr.
Fugloyar:	– Ábøtur á gomlu lendingina í Haftarvík og lendingin við Trøllagjógv 95% av 100.000 kr./árið í 4 ár	95% av	100.000
Viðareiðis:	– Uppgongd frá báti (lending) í Villingardali		100.000
Klaksvíkar:	– Uppskipingarbryggju við báta-brúgvarnar á Varpinum		120.000
Kunoyar:	– Bátahavn í Haraldssundi 3/4 av 200.000 kr./árið 2 ár		200.000
	– Lendingarviðurskiftiini Fyri Sunnan Gjógv		50.000
Runavíkar:	– Bátahylin á Glyvrum 3/4 av 150.000 kr./árið 3 ár		150.000
Nes:	– Afturgerð av brimskaða inni í Oyrunum 3/4 av 100.000 kr./árið 2 ár		100.000
Sjóvar:	– Ískoytisstudning til bátahavnina í Heygsstøð 3/4 av 100.000 kr./árið 2 ár		100.000
Sunda:	– Bátahylin á Oyrabakka 3/4 av 150.000 kr./árið 3 ár		150.000
		at flyta	1.070.000

		flutt	1.070.000
Haldórsvíkar:	– Lendingina í Tjørnuvík		100.000
Vestmanna:	– Arbeiðið við at leggja verjugrót um pierin á Fitjum - pierin v. m. bátahylin og bátahylin		150.000
Argja:	– Brimskaðastudning og liðugtgerð av bátahavnini 3/4 av 600.000 kr./árið 5 ár		600.000
Sands:	– Umvæling av bátalyft í havnini 3/4 av 200.000 kr./árið 3 ár		200.000
Skopunar:	– Liðugtgerð av arbeiðinum kring flakavirkið 3/4 av 150.000 kr./árið 3 ár		100.000
Húsavík:	– Bakkan úti í Stød í Dali 3/4 av 150.000 kr./árið 2 ár		150.000
Skúvoyar:	– Arbeiði í gerð í Dímun		30.000
Hvalbiar:	– Brimverju, ið er gjørd undir kirkjugarðinum í Sandvík 3/4 av 150.000 kr. árið 3 ár		150.000
	– Ábøtur á atløguna á Fiskieiðinum í Hvalba vegna brimskaða		40.000
Tvøroyri:	– Bátahyl undir Tvørábakka og bátahyl í Trongisvági		100.000
Sumbiar:	– Bakkaverju í Sumba 3/4 av 200.000 kr./árið 3 ár		200.000
		75% av	2.890.000
		+ 20% av	100.000

Viðmerking:

Játtanin frá 1990 til Fugloyar kommunu, 3/4 av 200.000 kr. í 5 ár, verður broytt til:

90% av 200.000 kr./árið/5 ár	+	15 % av	400.000
		=	2.247.500

162. Broyting í løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v. m. á goymslu

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v. m. á goymslu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 35 frá 27. mars 1992 um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu verður gjørd henda broyting:

Í § 1 verður "1991" broytt til "1992".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m. v. på lager.

§ 1.

I lagtingslov nr. 35 af 27. marts 1992 om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager foretages følgende ændring:

I § 1 ændres "1991" til : "1992".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 35 frá 27. mars 1992 um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v. m. á goymslu er í § 1 av misgávum komið at standa 1991 í staðin fyri 1992.

163. Skálafjarðasiglingin við M/F Dúgvuni

I Uppskot

til

samtyktar

Tænastustøðið hjá M/F Dúgvuni millum Skálafjørðin og Tórshavn verður ikki lækkað.

II Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir, at heita á landsstýrið um at selja M/F Dúgvuna til ein og hvønn, sum hevur áhuga fyri at reka siglingina millum Skálafjørðin og Havnina eftir somu skipan sum hevur verið galdandi síðani 1985.

Viðmerkingar:

Hóast samgonguskjalið millum Føroya Javnaðarflokk og Hin Føroyska Fólkaflokkin ger greitt, at virksemið hjá strandferðsluni ikki skal økjast, so kom dátt við at hoyra, at ætlanir nú eru frammi um at skerja Skálafjarðarsiglingina við meira enn 44% ella við 11 túrum um vikuna.

Tað er komið alment fram, at allir túrarnir á middegi skulu strikast hvønn dag í viku, umframt allir túrar leygardagar og sunnudagar.

Tað er vónleyst at fáa eyga á tað skilagóða í hesi sparing, tvørturímóti tykist henda ætlan at skerja inntøkumøguleikarnar hjá strandferðsluni, og økja um útreiðslurnar hjá teimum, sum skulu ferðast millum Skálafjørðin og Tórshavn.

Tey upp ímóti 1.000 fólkini, sum ferðast um vikuskiftini um veturin og tey umleið 2.000 fólkini um summarið, hava eftir hetta triggjar møguleikar: 1) at ferðast við bussi fyri dupultan kostnað, 2) at koyra við egnum bili og ella 3) lata vera við at ferðast yvirhøvur.

Henda skerjing skal spara Strandfaraskipum Landsins pening verður sagt, uttan at prógv verða førd fyri sparda peninginum.

Tá ið landsstýrið legði uppskot fram á ting um keyp av M/F "Dúgvuni" 21. februar 1985, segði landsstýrið í viðmerkingum sínum: "Strandferðslan hevur

gjørt eina rakstrarætlan fyri ferjuna í rutusiglig millum Skálafjørðin og Havnina. Eftir hesi rakstrarætlan kunnu vit vænta, at ferjan kemur at hava eina inntøku uppá umleið 7 mió. kr."

Samanbera vit flutningstølini hjá M/F Dúgvuni øll árini: bilflutning, ferðafólk og farm, so er lítið samsvar millum roknskapartølini og tey veruligu flutningstølini, sum alment eru til skjals, og tí ber tað ikki til at lata sum einki nú hesi viðurskifti eru avdúkað, og átti ein slík viðmerking sum hendan av sær sjálvum at ført til, at tølini verða rættað samsvarandi veruleikanum.

Á síðu 5 er greit fraá rakstrinum fyri M/F "Dúgvuna" fyri rakstrarárið 1990. Keldurnar sum nýttar eru, eru roknskapurin hjá Strandfaraskipum Landsins fyri 1990, og upplýsingar frá manning og avgreiðslum uppi á landi.

Lítið ella einki samsvar eru millum hesar báðar roknskapirnar, meðan veruliga støðan byggir á eina inntøku uppá 12.594.854 kr., vísir roknskapurin hjá Strandfaraskipum Landsins eina inntøku uppá bert 5.950.126 kr. ella 6.644.728 kr. minni enn hagtølini hjá M/F Dúgvuni vísa á.

Tað ber á ongan hátt til at lata ein slíkan skeivleika fara aftur við borðinum, og at landsstýrið brúkar beinleiðis skeiv tøl fyri at skerja túratalið hjá "Dúgvuni".

Tað tykist lítil og eingin ivi um, at landsstýrið við at skerja túratalið hjá "Dúgvuni" við hesi grundgeving hevur tikið støðu út frá skeivum fortreytum, og tí má tað metast at verða bæði rímuligt og rætt, at skeivleikarnir verða rættaðir.

Tað tykist at verða trupult at fáa samgonguflokkarnar at halda orð, tí í samgonguskjalinum verður sagt: "fremsta treytin fyri bygdamenning er, at sam-ferðsluviðurskiftini eru í lagi, og forsvarlig, soleiðis at lætt er at koma til og frá". Hetta rímar ikki saman við skerjingunum av túratalinum hjá Dúgvuni.

Um so er, at ætlanin framvegis er at halda fast um at skerja túratalið, so verður neyðugt at finna aðrar loysnir, og tað er at yvirlata rutuna til onnur, sum eru før fyri at dríva Skálafjarðasiglingina á ein forsvarligan og nøgdsaman hátt fyri fólkið í Suðurstreymoy og Norðoyggjum, og tað er at lýsa M/F Dúgvuna til sølu til ein og hvønn, sum vil dríva skipið eftir somu skipan, sum Strandferðslan hevur gjørt síðani 1985.

Viðmerkingar:

Upplýsingarnar stava frá manningini umborð á "Dúgvuni", og frá avgreiðslunum uppi á landi.

Bilflutningarin:

Sambært hagtølunum ferðaðust 42.286 bilar við "Dúgvuni" í 1990. Prísurin pr. persónbil er kr. 60,00 meðan prísurin á øðrum bilum liggur nógv hægri. Í útrokningini er meðalprísurin pr. bil roknaður út til kr. 120,00 pr. bil.

Strandferðslubilarnir:

Sambært hagtølunum ferðaðust 3.613 strandferðslubilar við "Dúgvuni". Í meðal er roknað við, at hesir kosta kr. 225,00 pr. túr, hóast stórur partur liggur omanfyri henda prís.

Ferðafólk:

Sambært hagtølunum ferðaðust 191.296 fólk við "Dúgvuni" í 1990. Av hesum vóru tað 173.906, sum goldu ferðaseðil, meðan hini 10% ella 17.390 ferðandi vóru børn undir skúlaaldri. Av tí at ikki øll ferðandi goldu fullan ferðaseðil av teimum 173.906 fólkunum, so er í roknskapartølunum roknað við einum meðalgjaldi pr. fólk uppá kr. 18,00 pr. túr.

Farmagjaldið:

Hesi tølini byggja øll uppá faktureringar, sum eru farnar fram á avgreiðslunum í Tórshavn, Strondum, Toftum, Klaksvík og aðrar, sum ikki eru skrásettar her. Tølini eru varðisliga uppsett.

Galdandi prísir fyri ferðina við "Dúgvuni""eru hesir:

Vaksin -	(einkult ferðaseðlar)	25,00
Vaksin -	(10 ferðakort)	175,00
Vaksin -	(mánaðarkort)	360,00
Børn (7-13 ár) og (pensionistar- einkult ferðaseðlar)		13,00
Persónbilur		60,00
Persónbilur -	(10 ferðakort)	450,00
Vøru- og lastbilar stytri enn 5 m.		80,00
- 5 til 7 m.		150,00
- 7 til 9 m.		210,00
- 9 til 11 m.		270,00
- 11 til 13 m.		330,00
longri enn 13 m.		390,00

Dagfrásøgn frá M/F "Dúgvuni":

	1988	1989	1990
Akfør	38.973	41.014	42.286
Ferðafólk	151.986	171.175	173.906
Ferðafólk børn	15.198	17.117	17.390
Sl. akfør	2.006	2.300	3.613

Dúgvan var á sleipistøð hesar dagar:

1988	26 dagar (oktober og november)
1989	39 dagar (september og oktober)
1990	14 dagar (september og oktober)

Niðurstøðan

Roundirnar sum gjørdar vórðu í sjeytiárunum og fyrst í áttatiárunum at beina fyri Skálafjarasiglingini, við at brúka ótíðarhóskandi skip sum t. d. gomlu Ternuna, Pride, Dagstjørnuna og Torshavn, og við at avlýsa fleiri túrar, eiga ikki at endurtaka seg, og tí eru hesi uppskotini til samtyktar ein álvarsom áheitan á samgonguna um ikki við einum pennastroki at leggja Skálafjarðarsiglingina í skeljasor.

Tað er heldur eingin ivi um, at samgongan: Føroya Javnaðarflokkur og Hin Føroyski Fólkaflokkurin, fólk teirra í landsstýri og á tingi, eiga at ásanna, at teir við ætlan síni eru farnir ov langt í høpisleysa hátti teirra at spara pening.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 163: Skálafjarðarsiglingin við m/f "Dúgvuni".

Málið er lagt fram av Lassa Klein, løgtingsmanni, tann 5. apríl 1991 og undir 1. viðgerð 17. apríl 1991 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur havt fund við landsstýrismannin og umsitingina. Á fundinum varð upplýst, at skerjingin á Skálafjarðarsiglingini sparir Strandfaraskipum landsins umleið 2,5 mió. kr. um árið.

Í viðmerkingunum til málið verða sett up tøl fyri "Dúgvuna", sum víkja so álvarsliga frá roknskapartølunum hjá Strandfaraskipum landsins. Samferðslunevndin metir hetta fyri álvarsligar ákærur móti stovnum at vera, ja, so álvarsligar, at tær mugu avsannast ella staðfestast.

Tá nevndin ongar møguleikar hevur at eftirkanna hesi tøl, setir ein samd samferðslunevnd fram soljóðandi:

uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur løgtingsgrannskoðarunum at kanna skuldsetingarnar í løgtingsmáli nr. 61/1990 (vetrarting) í móti Strandfaraskipum landsins frá Lassa Klein, løgtingamnni, og leggja úrslitið av hesi kanning fyri Føroya Løgting á ólavsøku 1991.

Nevndin hevur annars býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Óli Breckmann) førir fram:

Føroya løgting hevur á fíggjarlógini fyri 1991 fingið ásett ta peningaupphædd, ið Strandfaraskip landsins hevur til rakstur av hesum stovni.

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum hevur fingið ábyrgd av, at játtanin verður hildin.

Tí heldur minnilutin tað verða skeivt at áleggja landsstýrinum avmarkingar, sum gera, at landssstýrismaðurin ongar møguleikar hevur at fáa játtanina at halda, og setir tí einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Jákup Lamhauge og Terje Davidsen) hevur hesar viðmerkingar:

Síðani fyrst í hesi øld hevur regluligt rutusamband verið sjóvegis millum Tórshavn og Skálafjørðin, fyrst rikin á privatum grundarlagi og síðani fyrst í sjeytiárunum av Strandferðsluni. At rutusambandið millum høvuðsstaðin og Eysturoynna, nevniliga tað økið í landinum, sum hevur lutfalsliga eina størst virksemi á flestum økjum, hevur alstóran týdning, er eingin ivi um. Ætlan landsstýrisins um at skerja hesa rutu so nógv, sum talan er um nú - nevniliga við at skerja siglingina um vikuskiftini burtur, umframt eisini túrar aðrar dagar í vikuni, kann minnilutin ikki góðtaka og setir tí fylgjandi:

uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at Dúgvan siglir millum Skálafjørðin og Tórshavn hvønn dag í vikuni á einum rímiligum støði.

Ein triðji minniluti (Frank Davidsen og Jógvan Adolf Johannessen) mælir til, at málið verður sent landsstýrinum til kunningar.

Hin fjórði minnilutin (Heini O. Heinesen) førir fram, nú talan er um at skerja Skálafjarðarsiglingina so munandi, at sigligin er niðurløgd leygar- og sunnudagar, er vandi fyri, at hetta er byrjanin til endan við hesi sigling.

Harumframt ger henda skerjing, at umstøðurnar hjá ítróttarfólki gerast ómøguligar at ferðast í í vikuskiftinum.

Løgtingsgrannskoðararnir:

Kanningarúrslit

í

samband við løgtingsmál nr. 163/1991: Skálafjarðarsiglingin v/ m/f "Dúgvuni" (61/90).

Løgtingið álegði í uppskoti til samtyktar dagfest 24. apríl 1991 løgtingsgrannskoðarunum at "kanna tær skuldsetingar í løgtingsmáli nr. 61/1990 (vetrarting) ímóti Strandfaraskipum landsins frá Lassa Klein, løgtingsmanni, og leggja úrslitið av hesi kanning fyri Føroya Løgting á ólavsøku 1991."

Byrjanin til hetta mál var at Strandferðslan, fyri at spara, ætlaði at skerja skálafjarðarsiglingina, og mett varð at 2,5 mió. kr. kundu sparast um árið.

Í hesum sambandi gjørdi Lasse Klein ein faldara og setti fram uppskot til samtyktar tann 5. apríl 1991. Her verður gjørt vart við, at landsstýrið hevur tikið støðu til skerjingina av túratalinum hjá "Dúgvuni" út frá skeivum fortreytum. Sum prógv fyri hesum verður uppsettur ein alternativur rakstrarrokniskapur fyri árið 1990. Í viðmerkingunum til uppskotið verður m. a. víst á, at:

"Meðan veruliga støðan byggir á eina inntøku uppá 12.594.854 kr., vísir roknskapurin hjá Strandfaraskipum Landsins eina inntøku uppá bert 5.950.126 kr. ella 6.644.728 kr. minni enn hagtølini hjá M/F Dúgvuni vísa á."

Undir 1. viðgerðini verður gjørt vart við ymsar feilir, og 24. apríl tná Lasse Klein gera eitt uppískoyti til tær upprunaligu viðmerkingarnar, har inntøkurnar verða lækkaðar knappar 2 mió. kr. til 10.738.411 kr.

Niðurstøða:

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað hetta mál gjølla og niðurstøðan byggir á fleiri frágreiðingar og fundir um málið:

1. Løgtingsgrannskoðararnir hava frá roknskapargrannskoðanini fingið váttan fyri, at gjørdar eru kanningar sum vísa, at allur kontantur peningur frá "Dúgvuni" er avroknaður, er bókaður á Strandferðsluni og inntøkuførdur hjá "Dúgvuni".

2. Løgtingsgrannskoðararnir hava gjørt eina nærri kanning av inntøkunum sum Lasse Klein nýtir í sínari uppgerð.

Út frá teim sonn bagtølunum er úrslitið, at inntøkurnar av bilflutningi eru umleið 1 mió. kr. ov høgar, vegna tess at SL-bilarnar eisini verða tiknir við her og meðalprísurin er settur til 80 kr. í staðin fyri 60 kr.

Farmaflutningurin við SL-bilum verður bókaður viðkomandi rutu á landi, og flutningur við skipi er innroknaður í samlaða farmagjaldið.

Tí hevur Lasse Klein í sínari uppgerð mett, at teir 3600 SL-bilarnir sum eru fluttir á rutuni eiga at inntøkuførast til (fullan prís) kr. 390 pr. stk., í alt 1,4 mió. kr.

Men Lasse Klein hevur í sínum roknskapi eisini inntøkuført farmagjøld uppá slakar 2,5 mió. kr., hóast farmurin verður fluttur í omanfyri nevndu SL bilum. Lasse Klein hevur uttan at kanna grundarlagið nærri minkað útreiðslurnar við 8-900.000 kr.

Løgtingsgrannskoðararnir átala at ein løgtingmaður í einum løgtingmáli ber fram so skeivar upplýsingar og harvið avlagar eitt skilagott og sakligt orðaskifti um hetta mál.

3. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at tað er skeivt at Strandfaraskip Landsins ger serroknskapir fyri skipini, uttan at gera vart við hvørji prinsipp og hvørjar fyritreytir eru galdandi fyri býti av inntøkum og útreiðslum. Rakstrarúrslitini fyri tær einstøku eindirnar mega við verandi skrásetingar- og bókingarskipan sigast ikki at vera nøktandi, og kunnu sostatt ikki nýtast sum einsamalt grundarlag fyri avgerðum á samferðsluøkinum.

4. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at orðaskiftið sum verið hevur á tingi í hesum máli tíverri minst av øllum hevur snúð seg um tað er rætt ella skeivt at skerja Skálafjarðarsiglingina, og um tað er sannlíkt at spara 2,5 mió. kr. Hesin seinni spurningurin kann nú eitt ár aftaná svarast við einum fyrispurningi til Strandfaraskip Landsins/Føroya Landsstýri.

164. Sáttmáli um samstarv um at granska, varðveita og umsita hval og kóp í Norðuratlantshavi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar sáttmálan, sum varð undirskrivaður av John Petersen, landsstýrismanni - sambært landsstýrissamtykt 18. februar 1992 - 9. apríl 1992 í Nuuk, Grønlandi, um samstarv um at granska, varðveita og umsita hval og kóp í Norðuratlantshavi.

Viðmerkingar:

28. - 29. januar 1992 var fundur um framtíðar økissamstarv í spurningum um hval og kóp í Norðuratlantshavi.

Føroyar hava samstarvað við Grønland, Ísland, Noreg og Japan í spurningum um at gagnnýta hval og kóp skilagott síðan 1988. (CRUMM, Conference on Rational Utilization of Marine Mammals). Fundir hava verið í Reykjavík 1988, Tórshavn 1989, Tromsø 1990, Reykjavík 1991 og 7.-9. apríl 1992 í Nuuk). Kanada og Sovjetsamveldið hava verið eygleiðarar á hesum fundum.

Í 1990 skrivaði Jógvan I. Olsen, landsstýrismaður, undir skjal (Memorandum of Understanding) um samstarv um at granska, varðveita og umsita hval og kóp millum Grønland, Ísland, Noreg og Føroyar. NAC-samstarvið, North Atlantic Cooperation). (skjal 1). Arbeiðið í hesum sambandi hevur mest snúð seg um gransking. M.a. er tað hesin felagsskapur, sum hevur biðið ICES um ráðgeving um ymiskt í samband við samanspælið millum hval/kóp og fiskastovnar, harundir at gera stovnsmetingar av grindahvali. Í hesum skjali er eisini ein orðing, sum gevur møguleikar fyri størri samstarvi innan umsiting av hvali og kópi (§ 2).

Fundurin í Keypmannahavn var ein fyrireikandi fundur til 5. CRUMM-stevnu í Nuuk og skuldi serliga viðgera, hvussu samstarvið og umsiting kundi víðkast.

Spurningurin um økissamstarv er vorðin sera átroðkandi. Ísland hevur sagt seg úr IWC, (Altjóða Hvalaveiðiráðnum, International Whaling Commission). Kanada hevur samtykt, hóast hart trýst frá USA, ikki at melda seg inn aftur í IWC, hóast teir góvu inuittunum kvotu av stórhvali í fjør. Noreg hevur sagt, at atkvøður IWC

ikki fyri eini kvotu av sildreka í juni 1992 í Glasgow, so fara teir eisini burtur úr IWC í 1993. Japan hevur umhugsað bert at senda eitt umboð, at kalla sum eygleiðari, til IWC framyvir. IWC er sostatt komið til fall og týdningarmikið er tí at hava samstarv um tey ting, sum IWC ikki tekur sær av (kópur og smáhvalur) og um IWC dettur sundur, eisini stórhvalur. Tílíkt samstarv er kravt í havrættarkonvensjónini, UNCLOS, grein 65.

Á Norðurlandafundi í Stockholm 31. januar 1992 millum teir ráðharrar í norðanlondum, sum hava ábyrgdina av hvalaspurningum, vórðu hesir spurningar eisini viðgjørdir og tykist yvirhøvur semja millum norðurlanda ráðharrarnar, og hvalur og kópur kann gagnnýtast á burðardyggum grundarlagi. Fundurin gjørdi eitt uppskot til sáttmála um økissamstarv og eitt uppskot til ein lista yvir tey djórasløg, sum talan kann verða um. Føroyar høvdu hesi grundsjónarmið á fundinum:

at sáttmálin mátti viðurkenna serliga statsrættarstøðu okkara,
at sáttmálin annars mátti uppfylla krøvini í grein 65 í havarætnarkonvensjónini, UNCLOS,
at sáttmálin mátti vera ein karmur, sum kann fyllast út við tí, sum IWC - eftir okkara tykki - ikki hevði ræði á og um IWC fer sundur, so kundi hesin felagsskapur tikið yvir.

Víst varð eisini á, at ein semja var grundarlagið fyri støðuni hjá danska ríkinum í IWC og tað var meting okkara, at arbeiðið hjá Føroyum (og Grønlandi) innan danska ríkið hevði gjørt, at Danmark hevði fingið ein broyttan og týdningarmiklan leiklut bæði í IWC og aðrastaðni, har gagnnýtan av hvali verður umrødd, serliga í fyrircikingum til ST-stevnuna um "Umhvørvi og Menning", UNCED (United Nations Conference on Enviroment and Development), sum verður í Rio de Janeiro, Brasilia, juni 1992.

Sáttmálin er lagdur hjá á enskum (skjal 2) og á føroyskum (skjal 3). Sáttmálin uppfyllir krøvini í grein 65 í havrættarsáttmálanum, UNCLOS (United Nations Conference on the Law of the Sea). Ætlanin er, at sáttmálin verður millum fiskimálaráðini í sjálvstøðugu londunum og landsstýrinum í Føroyum og Grønlandi.

Á fundinum í Nuuk, Grønlandi 7. - 9. apríl vóru onkrar heilt smáar rættingar í tekstinum frá 28. - 29. januar. Undirskrivingin var frá Nuuk avtalað við danska uttanríkismálaráðið, sum góðkennir mannagongdina og er samt í, at hesin sáttmáli ikki er í stríð við ta semju, sum er millum Føroyar, Grønland og Danmark um hvalaspurningar.

Limagjald í hesum felagsskapi er ikki ásett, men verður neyvan stórt. Heldur er ikki avgjørt, hvar skrivstovan hjá felagsskapinum skal vera. Landsstýrið fer at skjóta upp, at skrivstovan verður í Havn.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 164/1991: Sáttmáli um samstarv um at granska, varðveita og um-sita hval og kóp í Norðuratlantshavi.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. mai 1992 og eftir 1. viðgerð tann 29. mai 1992 beint í marknaðarnevndina.

Sáttmálin varð undirskrivaður av John Petersen, landsstýrismanni, í Nuuk tann 9. apríl 1992, sambært landsstýrissamtykt frá 18. februar 1992.

Ein sand nevnd mælir tinginum til at góðkenna sáttmálan um framtíðar økissamstarv í spurninginum um hval og kóp í Norðuratlantshavi.

165. Løgtingslóg um umleggingarstuðul til trolbátar

Uppskot

til

Løgtingslóg um umleggingarstuðul til trolbátar.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað eftir umsókn at rinda umleggingarstuðul til 6 trolbátar, sum høvdu loyvi til troling innanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum í 1991 í sambandi við umlegging til snelluveiðu treytað av, at hesir ikki taka lut í troling innanfyri 12 fjórðingar frá tí degi henda lóg fær gildi og framyvir. Umleggingarstuðulin verður útgoldin av felagsjáttanini til fiskivinnuna í 1992.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om omlægningsstøtte til trawlskibe.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til efter ansøgning at udbetale omlægningstøtte til 6 trawlskibe, som havde tilladelse til trawlfiskeri indenfor 12 sømil fra grundlinjerne i 1991 i forbindelse med omlægning til snellefiskeri under forudsætning af, at disse skibe ikke deltager i trawlfiskeriet indenfor 12 sømil fra denne lovs ikrafttræden og fremover. Omlægningsstøtten udbetales af fællesbevillingen til fiskerierhvervet i 1992.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur í kunngerð nr. 58 frá 6. mai 1992 um troling innanfyri 12 fjórðingar saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins ásett, at ein umleggingarstuðul verður veittur teimum, sum eftir umsókn leggja um til snelluveiðu.

Landsstýrið heldur, at trolingin innanfyri 12 fjórðingar telur ov nógvar bátar og miðar við hesum fmóti, at talið í 1992 skal vera 12 bátar. Til tess at landsstýrið kann útgjalda henda stuðul, má heimild útvegast frá løgtinginum.

Fíggjarliga tapið hjá bátunum er býtt upp í tríggjar partar:

1. Beinleiðis útreiðslur í samband við at leggja um til snelluveiðu í 1992.
2. Mistar íløgur til trolveiðu, sum eftir hetta ikki kann nýtast til annað endamál.
3. Mist veiðuinntøka.

Víst verður á, at lættast er at gera upp tann beinleiðis kostnað, skipini hava havt í sambandi við tilrigging til fiskiskapin í ár, meðan tað er meira trupult at gera fíggjarliga tapið upp í sambandi við mista veiðuinntøku, sjálvt um størsti parturin av samlaðu inntøkunum hjá hesum bátum seinastu árini stavar frá trolveiðu innanfyri 12 fjórðingar.

Felagið Trolbátar hevur gjørt upp fíggjarliga tapið til 1,2 mió. kr. fyri hvørt skip. Hetta tal heldur landsstýrið verða ov høgt og mælir til, at umleggingarstuðulin verður mettur eftir veruliga kostnaðinum, tí í mesta lagi 700.000 kr. fyri hvønn bát.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 165/1991: Løgtingslóg um umleggingarstuðul til trolbátar.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. mai 1992 og eftir 1. viðgerð tann 29. mai 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við John Petersen, landsstýrismann, sum greiddi frá málinum. Hann upplýsti, at 5 bátar hava søkt um umleggingarstuðul.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen og Jógvan Ingvard Olsen) vísir á, at landsstýrið skjýtur upp, at goldið verður umleggingarstuðul til 6 trolbátar, sum høvdu loyvi til troling innanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum í 1991 í samband við umlegging til snelluveiði treytað av, at hesir ikki taka lut í troling innanfyri 12 fjórðingar frá tí degi henda lóg fær gildi

og framyvir. Meirilutin er av teirri áskoðan, at bátarnir eisini eiga at fáa stuðul til at leggja um til aðra veiðu enn snelluveiðu, og setir fram broytigaruppskot samsvarandi hesum.

Í viðmerkingunum til málið sigur landsstýrið, at umleggingarstuðulin verður mettur eftir veruliga kostnaðinum, tó í mesta lagi 700.000 kr. fyri hvønn bát.

Meirilutin er av tí fatan, at bátur, sum heilt gevst við at trola, skal fáa kr. 500.000 í umleggingarstuðuli, meðan bátur, ið bert gevst við at trola innanfyri 12 fjórðingar, men heldur fram við trolveiðu uttanfyri 12 fjórðingar, skal fáa kr. 250.000 í umleggingarstuðli.

Við hesum viðmerkingum mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við framnanfyri nevndu broyting og setir tí fram soljóðandi:

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður "snelluveiðu" broytt til "aðra veiðu".	I § 1 ændres "snellefiskeri" til "andet fiskeri".

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur undir við at minkað verður um bátatalið, sum fær loyvi at trola á landleiðini innanfyri 12 fjórðingar í 1992 og framyvir, men kann ikki taka undir við lógaruppskoti landsstýrisins soleiðis, sum tað er orðað.

Sum dømi kundi verið nevnt tann møguleiki, at tað ikki varð semja um troling innanfyri 12 fjórðingar í 1993, so vildi hetta fingið tær fylgjur, at teir 12 bátarnir, sum verða eftir í ár, seta krav um sama endurgjald, sum hesir hava fingið. Minnilutin (Heini O. Heinesen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) tekur undir við at minka munandi um talið av trolbátum á landleiðini og trýstið á fiskastovnarnar, sum er og hevur verið alt ov stórt.

Men sami minniluti kann ikki taka undir við, at fleiri slangur verða lagdar í landskassan sum er, og vísir á, at veiðimøguleikar hjá øðrum veiðihættum eisini eru skerdir, uttan at hesum verður veittur studningur úr landskassanum fyri lønarmiss og til umleggingar. Minnilutin (Niels Pauli Danielsen) setir einki uppskot fram.

166. Broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadjórum og krabbadjórum

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadjórum og krabbadjórum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skeljadjórum og krabbadjórum verður gjørd hesa broyting:

§ 7, stk. 4 verður orðað soleiðis:

"Stk. 4. Endurgjald verður ásett av landsstýrinum eftir tilmæli frá trimum metingarmonnum, harav tveir verða tilnevndir av landsstýrinum og ein av Havbúnaðarfelagnum. Endurgjaldsgrunnurin ber útreiðslurnar av virðismetingini.

§ 7, stk. 5 verður orðað soleiðis:

"Stk. 5. Virðið á fiskinum, skeljadjórinum ella krabbadjórinum verður at áseta eftir marknaðarvirðinum, sum fiskurin, skeljadjórið ella krabbadjórið hevur, tá avlívað verður. Av hesi upphædd fer møguligt søluvirði á tí avlívaða fiskinum og spardum útreiðslum."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om sygdomme hos fisk, skaldyr og krebsdyr.

§ 1.

I lagtingslov nr. 26 af 30. april 1987 om sygdom hos fisk, skaldyr og krebsdyr foretages følgende ændring:

§ 7, stk. 4 affattes således:

"Stk. 4. Erstatningen fastsættes af landsstyret efter indstilling fra tre vurderingsmænd, hvoraf to udnævnes af landsstyret og en af "Havbúnaðarfelagið". Erstatningsfonden afholder udgifterne af vurderingen.

§ 7, stk. 5 affattes således:

"Stk. 5. Fiskens, skaldyrets eller krebsdyrets værdi fastsættes efter markedsværdien, som fisken, skaldyret eller krebsdyret har, når den aflives. Af dette beløb fragår mulig salgsværdi af den aflivede fisk samt sparede omkostninger."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Í § 7, stk. 4 í verandi løgtingslóg stendur, at endurgjaldið verður ásett av trimum metingarmonnum. Hetta verður broytt soleiðis, at endurgjaldið verður ásett

av landsstýrinum eftir tilmæli frá trimum metingarmonnum. Hetta førir við sær, at landsstýrið kann gera broytingar í ásetta endurgjaldinum.

Tá endurgjald skal veitast í samband við, at landsdjóralæknin gevur boð um, at fiskur skal avlívast við heimild í § 7 orsakað av sjúku, skal verða sæð burtur frá tí sjúkuni, ið hevur verið atvoldin til avtøkuna. Í broytingaruppskotinum verður mælt til, at henda orðingin verður tikin burturúr § 7, stk. 5, soleiðis at metingarnevndin, tá endurgjald skal ásetast, eisini tekur við í metingina, at avlívaði fiskurin er sjúkur. Hetta fer at minka um møguligt endurgjaldskrav móti landskassanum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 166/1991: Broyting í løgtingslóg um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum.

Málið varð framlagt av landsstýrinum bin 27. mai 1992, og eftir 1. viðgerð tann 29. mai 1992 beint í fiskimálanevndina.

Málið snýr seg um at avmarka endurgjaldskravið móti landskassanum, tá ið landsdjóralæknin gevur boð um, at fiskur skal avlívast orsakað av sjúku.

John Petersen, landsstýrismaður hevur verið á fundi og greitt frá, at mál hesum viðvíkjandi kunnu við uppskotnu lógarbroytingini avgreiðast skjótari av tí, at metingarnevndin og alarin kunnu samráðast um eina upphædd í staðin fyri, at all skal teljast nágreiniliga upp og ivaleyst fáa eina longri viðgerð.

Semjast alarin og metingarnevndin um eina upphædd, kann endurgjaldið avgreiðast munandi skjótari.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Frank Davidsen og Jákup Lindenskov) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Asbjørn Joensen og Edmund Joensen) vísir til viðmerkingarna, ið sami minniluti hevur sett fram í sambandi við tingmáli 167/1991.

Minnilutin kann ikki taka undir við, at tað verður politiski myndugleikin, ið ásetir endurgjaldsupphæddir í sambandi við avlíving av sjúkum fiski, skeljadýrum og krabbadýrum.

Einki broytingaruppskot verður sett fram.

167. Broyting í løgtingslóg um aling av fiski

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v. m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 70 frá 9. juni 1988 um aling av fiski sum broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 29. mai 1990 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 2 verður strikað.
2) § 2, stk. 3 verður § 2, stk. 2.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om opdræt af fisk m. v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 70 af 9. juni 1988 om opdræt af fisk m.v. som ændret ved lagtingslov nr. 85 af 29. maj 1990 foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 2 udgår.
2) § 2, stk. 3 bliver § 2, stk. 2.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Fíggjarstøðan í alivinnuni er vánalig í løtuni. Fleiri alarar eru noyddir at gevast, alibrúk verða niðurløgd og onnur alibrúk verða rikin av bankunum ella øðrum verandi alarum. Støðan í alivinnuni er soleiðis í løtuni, at trupult er at halda skil á, hvør eigur og hvør rekur tey ymisku alibrúkini.

Loyvini eru í lógini avmarkað soleiðis, at eitt felag ikki kann hava loyvi til størri vídd enn 6000 m². Henda avmarking í lógini um mest loyvdu vídd til eitt felag er óhcppin sum støðan er í dag, og hevur onga reella ávirkan, men førir bert óneyðuga umsiting og fortreðiligheitir í vinnuni við sær. Sostatt verður mett, at fyri ikki at skapa óneyðuga umsiting, er rættast at taka avmarkingina um vídd úr lógini.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 167/1991: Broyting í løgtingslóg um aling av fiski.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. mai 1992 og eftir 1. viðgerð tann 29. mai 1992 beint í fídnaðarnevndina.

Málið snýr seg um at avtaka avmarkingina uppá 6.000 m² til hvørja alistøð.

John Petersen, landsstýrismaður hevur verið á fundi og greitt frá at landsstýrið heldur, at henda avmarking er til ampa fyri alivinnuna, orsakað av tí torførru búskaparligu støðu, ið alivinnan er í í dag.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Frank Davidsen og Jákup Lindenskov) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen og Edmund Joensen) metir, at alivinnan átti at verið kunnað og eftirspurd, tá broyting verður framd í sjálvum grundarlagnum fyri vinnuni. Sami minniluti kann ikki góðtaka grundgevingina fyri ikki at viðgera málið í samráð við vinnuna, at vinnan er ov illa skipað. Minnilutin hevur sett seg í samband við vinnuna, ið greiðir frá, at alivinnan við jøvnum millumbilum til fánýtis síðan miðskeiðis í 80-unum hevur heitt á myndugleikarnar at fremja m. a. hesa broyting. Grundgeving vinnunnar hevur verið umhvørvisvernd og fyribyrging. Nú vinnan stendur fyri hóttafalli, er tað belst ov seint at broyta teir ytru karmarnar til frama fyri vinnuna.

Minnilutin tekur av áðurnevndu grundum ikki undir við málinum.

168. Broyting í løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju v.m.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju v. m.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 um serligt gjald á brenniolju v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 1. b, verður:
"Gassolja (viskositet við 38 stig C undir 200 sec. Redwood 1) 1 litur 0,70 kr." broytt til:

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie m. v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 99 af 1. oktober 1986 om særlig afgift på brændselsolie m.v. foretages følgende ændringer:

1. I § 1, stk. 1. b, ændres:
"Gasolie (viskositet ved 38 grader C under 200 sec. Redwood 1) 1 liter 0,70 kr." til:

"Gassolja (viskositet við 38 stig C undir 200 sec. Redwood 1) 1 litur 0,85 kr."

2. Í § 1, stk. 4. verður "2,15 kr./liturin" broytt til: "2,30 kr./liturin" og "0,7 oyru/liturin" broytt til "0,5 oyru/-liturin."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

"Gasolie (viskositet ved 38 grader C under 200 scc. Redwood I) 1 liter 0,85 kr."

2. I § 1, stk. 4. ændres "2,15 kr./liter" til: "2,30 kr/liter" og "0,7 øre/liter" til "0,5 øre/liter."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Broytingin í løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju er ein partur av ætlan landsstýrisins at útvega meirinntøku til landskassan.

Uppskot landsstýrisins er at hækka serliga gjaldið á brenniolju við 0,15 kr. pr. litur. Í 1991 vórðu 85 mió. litrar av brenniolju seldir til nýtslu innanlands, tvs. til húsarhald og íðnað.

Við óbroyttari sølu hevði meirinntøka landskassans fyri alt árið 1992 verið 12.750.000 kr. ella umleið 7 mió. kr., tað ið eftir er av 1992.

Ætlan landsstýrisins er at leggja uppskot fram á ólavsøkutingsetuni um at hækka samskiftis- og brennistudningin til pensiónistar við kr. 100,-.

169. Broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v. m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982, um vektgjald av motorakførum v. m. við seinni broytingum, verður § 3 orðað soleiðis:

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om vægtafgift på motorkøretøjer m. v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 31. marts 1982, med senere ændringer, om vægtafgift af motorkøretøjer mv. foretages følgende ændringer:

"§ 3. árligt gjald verður at rinda eftir hesi gjaldskrá:

§ 3 affattes således:
"§ 3. Der svares afgift efter følgende helårlige satser:

	Vektgjald Vægtafg.	**Útjavn.gj. Udlign.afg.**	**Viðf.vognur Påhængsv.**
	kr.	**kr.**	**kr.**
A. *Persónsvognar, tó ikki bussar og hýruvognar.* **A.** *Personbiler, bortset fra busser og hyrevogne,*			
upp til 600 kg. eginvekt indtil 600 kg. egenvægt	810		
601 - 800 - -	1.080	430	
801 - 1100 - -	1.340	530	
1101 - 1300 - -	1.720	720	
1301 - 1500 - -	2.250	970	
1501 - 2000 - -	3.110	1.250	
yvir 2000 - - over 2000 - -	3.430	1.740	
B. *Hýruvognar* **B.** *Hyrevogne*			
upp til 800 kg. eginvekt indtil 800 kg. egenvægt	650	2.580	
801 - 1100 -	860	3.220	
1101 - 1300 -	1.120	3.860	
1301 - 1500 -	1.460	4.190	
yvir 1500 - over 1500 -	1.980	4.510	
C. *Motorsúkklur* **C.** *Motorcykler*	540	150	

D. *Bussar*	**kr.**	**kr.**	**kr.**
D. *Busser*			
Upptil 2000 kg. eginvekt	900	1.610	
Indtil 2000 kg. egenvægt			
2001 - 4000 kg. -	1.070	2.900	
yvir 4000 kg. -	1.716	4.180	
E. *Vøru- og lastvognar, traktorar o. l.*			
E. *Vare- og lastvogne, traktorer o. l.*			
Upp til 1500 kg. totalvekt	650	2.570	70
Indtil 1500 kg. totalvægt			
1501 - 2000 kg. -	730	2.570	140
2001 - 2500 - -	820	2.740	170
2501 - 3000 - -	900	2.900	260
3001 - 3500 - -	990	3.220	390
3501 - 6000 - -	1.080	3.860	520
6001 - 8000 - -	1.500	4.510	770
8001 - 9000 - -	1.720	5.150	1.030
9001 - 10000 - -	1.930	5.800	1.160
10001 - 11000 - -	2.150	6.440	1.720
11001 - 12000 - -	2.360	7.080	1.890
yvir 12000 - -	2.570	7.720	2.060
over 12000 - -			

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Hækkingin av vektgjaldinum av motorakførum er ein partur av tí búskaparpolitisku semju, sum landsstýrið nú leggur fyri tingið.

Uppá eitt heilt ár hevði henda hækking givið umleið 3 mió. kr., men av tí at hækkingin bert fær týdning fyri gjaldið fyri seinna hálvár 1992, verður meirinntøkan í 1992 bert umleið 1,5 mió. kr.

170. Broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli 1989 um bundna uppsparing við seinni broytingum verður § 4, stk. 2 orðað soleiðis:

"Stk. 2. Uppsparingin fyri 1989 verður rentað við 5% p.a. Ein triðingur verður útgoldin í 1992, ein triðingur í 1993, og ein triðingur í 1994. Afturgjalding fer annars fram, tá tann uppsparingarskyldugi verður 65 ár, kemur í gjaldstrot ella doyr."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om bunden opsparing.

§ 1.

I lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989 om bunden opsparing med senere ændringer affattes § 4, stk. 2 således:

"Stk. 2. Opsparingen for 1989 forrentes med 5% p.a. En tredjedel udbetales i 1992, en tredjedel i 1993, og en tredjedel i 1994. Tilbagebetaling finder ellers sted, når den opsparingspligtige dør, går konkurs eller afgår ved døden."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Bundna uppsparingin í 1989 var at skilja sum eitt lán frá skattaborgaranum til landskassan. Hetta lán var 95,6 mió. kr. stórt. Upprunaliga ætlanin við uppsparingini fyri 1989 var, at hon skuldi flytast á konto hjá skattgjaldaranum 1. juli 1992, men ikki koma til útgjaldingar, fyrr enn skattaborgarin fylti 65 ár.

Við framlagda lógaruppskotinum ætlar landsstýrið at framskunda hesa afturgjalding soleiðis, at ein triðingur av uppsparingini verður afturgoldin í 1992, ein triðingur í 1993 og at seinasti triðingurin verður afturgoldin í 1994.

171. Eykaskattur til landskassan

Uppskot

til

Løgtingslóg um eykaskatt til landskassan.

§ 1.

Fyri skattaárið 1992 verður útskrivaður eykaskattur til landskassan.

Stk. 2. Skyldu til at rinda eykaskatt hava persónar og felløg v.m, sum eru skattskyldug í hesum skattaári sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

Stk. 3. Hesin eykaskattur verður roknaður av skattskyldugu inntøkuni, so leiðis sum henda verður ásett eftir reglunum í galdandi skattalóggávu, samanber stk. 4 og 5.

Stk. 4. Fyri persónar er henda lóg galdandi fyri inntøkur frá 1. januar 1992 (skattaárið 1992).

Stk. 5. Hvat feløgum v.m., sum eru skattskyldug sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, viðvíkur, verður skatturin lagdur út á inntøkuna í tí inntøkuári, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1991.

§ 2.

Eykaskatturin verður fyri skattskyldugar persónar roknaður við 2% av skattskyldugari inntøku uppá 181.111 kr. til 200.000 kr., við 3% av skattskyldugari inntøku upp á 200.000 kr. til 300.000 kr.

Lagtingslov om ekstraskat til landskassen.

§ 1.

For skatteåret 1992 udskrives ekstraskat til landskassen.

Stk. 2. Pligt til at betale ekstraskat har personer og selskaber m.v., som er skattepligtig i dette skatteår i medfør af lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer.

Stk. 3. Denne ekstraskat beregnes af den skattepligtige indkomst, således som denne er fastsat efter reglerne i gældende skattelovgivning, jfr. stk. 4 og 5.

Stk. 4. For personer har denne lov virkning for indkomster fra 1. januar 1992 (skatteåret 1992).

Stk. 5. For så vidt angår selskaber m.v., som er skattepligtige i medfør af lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer, er grundlaget for skatteansættelsen det indkomstår, som udløber i eller falder sammen med kalenderåret 1991.

§ 2.

Ekstraskatten beregnes for personlige skattepligtige med 2% af skattepligtig indkomst på kr. 181.111 til kr. 200.000 med 3% af skattepligtig indkomst på kr. 200.000 til kr. 300.000 og med 4%

og við 4% av skattskyldugari inntøku upp á 300.000 kr. og hægri. Fyri skattskyldug feløg v.m. verður eykaskatturin 4 1/2% av skattskyldugari inntøku upp á 180.000 og hægri. § 54, stk. 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er ikki galdandi fyri eykaskatt eftir hesi lóg.

§ 3.

Eftirhildin fyribilsskattur eftir reglunum í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum saman við eykaskattinum eftir hesi lóg kann ikki vera meira enn 55% av tí einstøku útgoldnu A-inntøkuni.

Stk. 2. Í førum har frestandi skattur eftir reglunum í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er fluttur frá árinum fyri, kann eftirhildin fyribilsskattur eftir reglunum í somu lóg saman við eykaskattinum eftir hesi lóg tó ikki vera meira enn 55% av útgoldnu A-inntøkuni.

§ 4.

Landsstýrið fær heimild til at ásseta tær reglur, sum eru neyðugar fyri, at henda lóg kann framjast, so sum at áseta reglur, sum skulu tryggja, at persónar ikki kunnu flyta inntøkur frá tíðarskeiðinum, henda lóg er galdandi fyri.

§ 5.

Reglurnar í skattalóggávuni eru annars galdandi fyri eykaskattin eftir hesi lóg, har annað ikki er ásett í hesi lóg.

af skattepligtig indkomst på kr. 300.000 kr. og højere. For skattepligtige selskaber m.v. beregnes ekstraskatten med 4 1/2% af skattepligtige indkomster på kr. 180.000 og højere. § 54, stk. 2 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landskat og kommuneskat med senere ændringer gælder ikke for ekstraskat efter denne lov.

§ 3.

Tilbageholdt forløbig skat i medfør af lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer sammen med ekstraskat efter denne lov må ikke overstige 55% af den enkelte udbetalte A-indkomst.

Stk. 2. I de tilfælde, hvor restskat ifølge reglerne i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat er overført fra foregående år, kan tilbageholdt foreløbig skat efter samme lov sammen med ekstraskat efter denne lov ikke overstige 55% af udbetalt A-indkomst.

§ 4.

Landsstyret bemyndiges til at fastsætte de for lovens gennemførelse nødvendige regler, herunder at fastsætte regler, som skal sikre, at personer ikke kan overføre indkomst fra det tidsrum, som denne lov er gældende for.

§ 5.

Reglerne i skattelovgivningen gælder i øvrigt for ekstraskat efter denne lov, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Til § 1:
Í hesi grein verður ásett, at lógin er galdandi fyri persónar og felǿg, sum eru skattskyldug í hesum ári. Hetta merkir, at eisini persónar, ið eru undir avmarkaðari skattskyldu, koma undir lógina.

Til § 2:
Ásett verður, at § 54, stk. 2 í skattalógini ikki er galdandi fyri hesa lóg, og merkir hetta, at reglan um 50% hámarkið fyri samlaða inntøkuskattin av skattskyldugu inntøkuni ikki er galdandi fyri vanliga inntøkuskattin.

Til § 3:
Ásett verður her, at hámarkið fyri, hvat afturhaldast kann í tí einstøku lønarútgjaldingini, verður 55%.

Til § 4:
Landsstýrið fær heimild til at áseta reglur, sum skulu tryggja, at inntøkur ikki verða fluttar frá tíðarskeiðinum, lógin er galdandi fyri, t.d. við at vinnurekandi broyta uppgerðarhátt, tíðspunkt fyri útgjaldingar av lønum verður broytt í mun til undanfarin ár, ella lønin verður lækkað í nevnda tíðarskeiði.

172. Løgtingslóg um rentuskatt

Uppskot

til

Løgtingslóg um rentuskatt.

§ 1.

Renta, sum føroyskir peningastovnar og postgiro geva av innistandandi peningi, herundir ábyrgdarpeningur í føroyskum sparikassum og renta av føroyskum lánsbrøvum, verður skattað eftir reglunum í hesi lóg.

Lagtingslov om renteskat.

§ 1.

Rente, som færøske pengeinstitutter og postgiro yder af indskud, herunder garantiindskud i færøske sparekasser og rente af færøske obligationer, beskattes efter reglerne i denne lov.

Stk. 2. Sum føroysk lánsbrøv eftir stk. 1 eru at skilja lánsbrøv givin út í Føroyum av føroyskum almennum myndugleika, føroyskum fíggjarstovni ella fíggjarfeløgum og líknandi.

§ 2.

Skyldu at gjalda rentuskatt eftir hesi lóg hava persónar og feløg v.m., sum hava rætt til tær rentuinntøkur, sum tilskilaðar eru í § 1 í hesi lóg, og sum eru skattskyldug eftir § 1 ella § 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

Stk. 2. Umframt tey í stk. 1 nevndu feløg v.m. hava eisini Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess, fleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut skyldu til at rinda rentuskatt eftir hesi lóg.

Stk. 3. Tey í stk. 2 nevndu sparikassar, tryggingarfeløg, grunnar og stovnar hava skyldu til eisini at rinda 18% av rentum av innistandandi í útlendskum, heruppií donskum og grønlendskum peningastovnum v. m., og av inntøkum sum útlendsk, heruppií donsk og grønlendsk, virðisbrøv kasta av sær.

§ 3.

Renta, sum verður tilskrivað konti hjá persónum, verður skattað við 9% p.a. roknað av tilskrivaðu rentuupphæddini og við 18% p.a., um kontohavarin er eitt felag v.m., sbrt. § 2.

Stk. 2. Som færøsk obligation i stk. 1 skal forstås obligation udstedt på Færøerne af færøsk offentlig myndighed, færøske finansieringsinstitutter eller finansieringsforeninger og lignende.

§ 2.

Pligt til at betale renteskat efter denne lov påhviler personer og selskaber m.v., som er berettiget til de renteindtægter, som er anført i denne lovs § 1, og som er skattepligtige i medfør af § 1 eller § 2 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer.

Stk. 2. Foruden de i stk. 1 nævnte selskaber m.v. har også Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og dets samtlige afdelinger, fleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut pligt til at betale renteskat efter denne lov.

Stk. 3. De i stk. 2 anførte sparekasser, forsikringsselskaber, fonde og institutioner har pligt til også at betale 18% af renter af indskud i udenlandske, herunder danske og grønlandske, pengeinstitutter m. v. og af afkast af udenlandske, herunder danske og grønlandske værdipapirer.

§ 3.

Rente, som tilskrives en persons konti, beskattes med 9% p.a. beregnet af den tilskrevne rente og med 18% p.a. når kontohaveren er et selskab m.v. jfr. § 2.

Stk. 2. Kontohavarin ber skattin, men verður hann av peningastovni ella postgiro kontohavarans vegna rindaður burturav tí tilskrivaðu rentuni.

Stk. 3. Peningastovnar og postgiro skulu í seinasta lagi tann 15. í mánaðinum aftaná rentutilskriving avrokna rentuskattin til landskassan.

§ 4.

Rentuskatturin eftir hesi lóg fer í landskassan.

§ 5.

Ásetingarnar í § 2, § 3, stk. 2 og 3 og § 4 eru eisini galdandi fyri rentu av lánsbrøvum smbrt. § 1. Rentuskattur av hesum lánsbrøvum er 18% p.a., og skal tann, sum rindar eigarunum av lánsbrøvunum rentuna, halda 18% p.a. av rentuni aftur sum rentuskattur og avrokna rentuskattin til landskassan eftir ásetingunum í § 3.

§ 6.

Landsstýrið kann áseta nærri reglur um fyrisitingina av hesi lóg.

§ 7.

Reglurnar í skattalóggávuni eru annars galdandi fyri rentuskatt eftir hesi lóg, har ikki annað er ásett í hesi lóg.

Stk. 2. Í reglum, sum ásettar verða við heimild í § 6, kann ásetast revsing við sekt fyri brot á ásetingarnar í hesum reglum.

Stk. 3. Sekt eftir hesi lóg fellur til landskassan.

§ 8.

Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1992 og verður galdandi fyri rentu, ið verður

Stk. 2. Skatten påhviler kontohaver, men betales for kontohavers regning af pengeinstitutter eller postgiro af den til skrevne rente.

Stk. 3. Pengeinstitutter og postgiro skal senest den 15. i måneden efter rentetilskrivning afregne renteskatten til landskassen.

§ 4.

Renteskatten i henhold til denne lov tilfalder landskassen.

§ 5.

Bestemmelserne i § 2, § 3, stk. 2 og 3 og § 4 er også gældende for rente af de i § 1 nævnte obligationer. Renteskatten af disse obligationer er 18% p.a. og skal den, som udbetaler renten, tilbageholde 18% p.a. af renten som renteskat og afregne renteskatten til landskassen i henhold til bestemmelserne i § 3.

§ 6.

Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om administrationen af denne lov.

§ 7.

Reglerne i skattelovgivningen gælder iøvrigt for renteskat efter denne lov, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

Stk. 2. I forskrifter, der fastsættes med hjemmel i § 6, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelserne i forskrifterne.

Stk. 3. Bøde efter denne lov tilfalder landskassen.

§ 8.

Denne lov træder i kraft 1. juli 1992 og har virkning for rentetilregning fra og

tilskrivað frá og við 1. juli 1992.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum.

med 1. juli 1992.

Stk. 2. Samtidig sættes ud af kraft lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indtægtsskat af renter af indestående i færøske pengeinstitutter og sparekasser.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins er uppskot um nýggja lóg um rentuskatt, sum skal koma í staðin fyri verandi løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikøssum.

Sjálv skipanin í uppskotnu rentuskattalógini er tann sama, sum í verandi lóg um rentur av innistandandi peningi, t.v.s. rentuinntøka av innistandandi peningi í Føroyum verður verandi hildin uttanfyri vanliga skattskylduga inntøku eftir § 25 í skattalógini, men verður fastaðin skattað eftir reglum í serstakari lóg.

Tað verða framvegis peningastovnar og postgiro, sum koma at rokna og krevja rentuskattin frá kontohavaranum við eftirfylgjandi avrokning til landskassan/Føroya Gjaldstovu.

Í uppskotinum verður skyldan til at gjalda rentuskatt tengd at fullari og avmarkaðari skattskyldu til Føroyar eftir skattalógini, bæði hvat ávikavist persónum og feløgum v.m. viðvíkur. Tó koma eisini ávís feløg, ið ikki eru skattskyldug eftir skattalógini eisini undir skyldu at gjalds rentuskatt eftir hesi lóg. Talan er um tey í § 2, stk. 2, nevndu føroysku fíggjarfeløg og stovnar, sum í dag annars ikki eru skattskyldug. Í hesi feløg og stovnar v.m. verður umframt eina skyldu at gjalda rentuskatt av rentuinntøku stavandi frá innistandandi í Føroyum eisini áløgd ein skylda at gjalda 18% í skatti av rentuinntøku av innistandandi í útlendskum peningastovnum v.m. herundir eitt nú postgiro o.l.

Somu feløg, stovnar v.m. skulu eisini rinda í skatti eftir hesi lóg 18% av allari inntøku, tey hava av útlendskum virðisbrøvum, t.v.s. bæði av tí inntøku, sum partabrøv og obligatiónir v.m. geva av sær, tað verði seg sum vinningsbýti, renta ella kursvinningur, so skulu latast 18% av skatti av hesi inntøku.

Við heimild í § 6 og § 7, stk. 2 kann landsstýrið áseta nærri reglur, sum eru neyðugar til at stýra uppkrevjingini av hesum skatti, og annars áseta tey krøv, sum gerast neyðug til skjalprógv av upplýsingum hesum viðvíkjandi.

Samstundis verður sum ein neyðug broyting av hesum skotið upp at gera rentuinntøku úr Føroyum til inntøku, sum førir avmarkaða skattskyldu til Føroyar við sær, so samsvar er millum skattalógina á hesum økjum og rentuskattalógina.

Sí viðmerkingar til broyting í skattalógini hesum viðvíkjandi.

Okkara verandi rentuskattaskipan er í altjóða skattasamanhangi ikki góðtikin sum ein veruligur skattur, við tað, at vit ikki rokna rentuskattin av sjálvari rentuinntøkuni, men ístaðin hava nýtt innistandandi upphædd sum grundarlag fyri skattaútrokningini. Hetta hevur eitt nú ført við sær, at tá vit hava gjørt dupultskattasáttmálar við onnur lond, so er rentuskatturin í Føroyum ikki virðin umfataður av avtaluni, eins og hetta í øðrum førum er komið til sjóndar, tá útheimurin í nøkrum førum hevur gjørt vart við, at Føroyar er at meta sum góðkent skattaland, tó við undantaki av tí verandi rentuskatti í Føroyum. Hetta tí tá rentuskatturin ikki verður roknaður av rentuinntøkuni, og ei heldur verður taldur við í skattskyldugu inntøkuna eftir skattalógini, so verður verandi rentuskattur mettur sum eitt avgjald og ikki ein skattur. Tað verður tí mett neyðugt, at vit í framtíðini skulu rokna rentuskattin av rentuinntøkuni. Harvið verður verandi "avgjald" broytt til skatt, og skuldi hetta eitt nú givið tann fyrimun, at okkara samlaða skattaskipan kann verða góðkend í altjóða samanhangi, og áhugin hjá útlendingum at innseta kapital í Føroyum kann økjast.

Uppskotið til rentuskattalóg ásetir rentuskattin at verða ávikavist 9% fyri persónar og 18% fyri felløg v.m. roknað av tilskrivaðu rentuni. Broytingin í rentuskattinum fyri persónar má síggjast í tí samanhangi, at grundarlagið fyri útrokning av rentuskattinum nú er eitt annað (sí hjálagda skjal 1). Hetta merkir eitt nú, at fyri vanligar innlánskonti, uttan uppsøgn, har rentan er 22% ella minni, og har vanligi 2% rentuskatturin er avmarkaður av ikki at skula verða meir enn 1/5 av tilskrivaðu rentuni, fer broytingin at føra við sær eina lækking, meðan tað er umvent fyri innlánskonti við uppsøgn, har innlánsrentan er umleið 7% p.a.

Dømir um ávirkanina av broytingunum í rentuskattinum: (persónur)

Dømi 1:

Konti til 2% p.a., innistandandi	10.000 kr.
rentuinntøka 2% av 10.000	200 kr.
2% av 10.000/tó max. 1/5 av tilskrivaðu rentuni	40 kr.
(50 kr. niðursett til 40 kr., tá rentan er minni enn 22%).	

Uppskot:

Rentuskattur 9% av rentuinntøkuni, sum er 200 kr. =	18 kr.
T.v.s. ein lækking í rentuskatti uppá (40-18 kr.) =	22 kr.

Dømi 2:

Konti til 7% p.a., innistandandi	10.000 kr.
rentuinntøka: 7% av 10.000 kr.	700 kr.
rentuskattur í dag:	
2% av 10.000	50 kr.

Uppskot:

rentuskattur: 9% av rentuinntøkuni uppá 700 kr. =	63 kr.
T.v.s. hækking í rentuskattinum uppá (63-50 kr.) =	13 kr.

Fyri feløg vil broytingin frá 2% av innistandandi upphædd til at verða 18% av tilskrivaðari rentu sýnast solciðis:

Dømi:

Konti til 7% p.a., innistandandi	100.000 kr.
rentuinntøka 7% av 100.000	7.000 kr.
rentuskattur í dag 2% av 100.000 =	500 kr.

Uppskot:

Rentuskattur 18% av rentuinntøku uppá 7.000 kr. =	1.260 kr.
T.v.s. ein hækking í rentuskattinum uppá (1.260 - 500) =	760 kr.

Isolerað sæð er hetta ein stór hækking, men má hetta samanhaldast við tí ætlaðu broytingina av øllum partafelagsskattinum, har sjálvur partafelagsskatturin verður munandi lækkaður, samstundis sum avseting til rakstrargrunn og fløgugrunn verður sett úr gildi, hvat partafeløgum viðvíkur. Somuleiðis má broytingin síggjast í relatión til ætlanirnar um broyting av mótrokningarreglunum fyri feløg, hvat rentuinntøku og rentuútreiðslum viðvíkur.

Rentuskatturin er eftir uppskotinum ikki tann sami fyri øll sløg av konti við tað, at skilt verður ímillum, hvør kontohavari er, t.v.s. um kontohavarin er ein fysiskur ella juridiskur persónur.

Í 1990 var samlaði rentuskatturin til landskassan góðar 32 mió. kr. og í 1991 góðar 31 mió. kr., og við at bæði nakrir persónar og nøkur feløg, sum í dag ikki gjalda rentuskatt, koma undir rentuskatt eftir uppskotinum, við tað at renta úr Føroyum nú førir til avmarkaða skattskyldu, og feløg og stovnar, sum vegna tess at tey ikki eru skattskyldug í dag, koma at gjalda rentuskatt, má væntast ein meirinntøka til landskassan av broytingini, men tá feløg og persónar eftir uppskotinum ikki koma at gjalda eins rentuskatt, er ikki gjørligt at meta nøkyvt um, hvussu nógv broytingin gevur í meirinntøku til land, men roknað verður við eini meirinntøku uppá uml. 40 mió. kr. árliga.

Sum broyting frá verandi lóg verður nú eisini skotið upp, at renta av ávísum lánsbrøvum/obligatiónum ikki longur skal íroknast í skattskyldugu inntøkuna eftir § 25, nr. 3 í skattalógini, men viðgerast og skattast á sama hátt sum renta av innistandandi í Føroyum, tó við einum skattaprosenti uppá 18%. Talan er um rentu av "føroyskum lánsbrøvum". Føroysk lánsbrøv verða eftir uppskotinum avmarkað til at vera lánsbrøv, ið eru sett út í Føroyum, og har útsetarin er føroyskur. Útsetarar kunnu eitt nú vera almennir myndugleikar, grunnar hjá tí almenna, tryggingarfeløg, peningastovnar og aðrar fíggjarfyritøkur.

Nakrar ásetingar í ásetingarlógini og skattalógini skulu broytast sum fylgja av hesum uppskoti. Talan er tó fyri tað mesta bert um rættingar av lógartilvísingunum og um eina innihaldsliga broyting av § 25, nr. 3 í skattalógini, so renta av føroyskum obligatiónum ikki longur skal roknast í skattskyldugu inntøkuna, men ístaðin skattast eftir hesi lóg.

Talan er um fylgibroytingar í § 4, stk. 2, 3 og 5 í ásetingarlógini og í skattalógini um § 2, stk. 1, nr. g, § 25, nr. 3, § 33, nr. 1, nr. 1 c og § 46, stk. 3, 4 og 5.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1:

Í § 1 verður ásett, at øll rentuinntøka, ið kontohavarar í føroyskum peningastovnum og postgiro fáa av teirra innistandandi, skal skattast eftir hesi rentuskattalóg. Somuleiðis skal renta av føroyskum lánsbrøvum, t.v.s. renta av lánsbrøvunt, sett út (udstedt) í Føroyum av føroyskum almennum myndugleika, stovni og av føroyskum fíggingarfyritøkum, skattast á sama hátt sum renta av innistandandi.

Samanhildið við skattalógina, sum í § 25, nr. 3 ásetir, at rentuinntøka, bæði av innistandandi og av obligatiónum, sum meginregla skal íeljast skattskyldugu inntøkuna, verður her gjørt eitt undantak fyri rentuinntøku, ið stavar frá innistandandi í Føroyum og renta av føroyskum lánsbrøvum. Hesar rentuinntøkur skulu sostatt ístaðin skattast eftir reglunum í hesi lóg, meðan øll onnur rentuinntøka, tað verið seg av útlendskum lánsbrøvum ella innistandandi í øðrum londum, skal gevast upp til skattingar sum skattskyldug inntøka eftir reglunum í § 25, nr. 3.

Til § 2:

Í § 2 er ásett, at persónur og feløg, ið í tann mun hesi eru skattskyldug eftir § 1 ella § 2 í skattalógini, skulu gjalda rentuskatt eftir hesi lóg. Harumframt er ásett, at Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut skulu gjalda ávikavist rentuskatt av rentum av innistandandi í Føroyum og útlandinum og av inntøkum av útlendskum virðisbrøvum.

Til § 3:

§ 3 ásetir rentuskattin fyri persónar til at verða 9% p.a. av rentuinntøkuni, t.v.s. tilskrivaðu rentuni og 18% fyri feløg og aðrar skipanir. Skipanin er tann, at peningastovnar og postgiro draga skattin av tilskrivaðu rentuni, flyta hana til landskassan/Føroya Gjaldstovu kontohavarans vegna.

Til § 4:

Her verður ásett, at rentuskatturin fellur til landskassan.

Til §§ 5-8:
Her verður víst til reglurnar um rentuskatting av rentu av innistandandi, sum eru galdandi á líknandi hátt fyri rentu av føroyskum lánsbrøvum. Lógin kemur í gildi 1. juli 1992 og hevur tí ávirkan fyri alla rentuinntøku av innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro og rentu av føroyskum lánsbrøvum, ið verður roknað frá og við 1. juli 1992.

Landsstýrinum verður heimilað at fyriseta gjøllari reglur fyri fyrisitingina av lógini.

Lógin er ætlað at koma at galda fyri rentu, sum verður tilskrivað/roknað frá og við 1. juli 1992.

173. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Uppskot

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1, litra g verður orðað soleiðis:

"fáa vinningsbýti úr Føroyum ella rentu, sum verður skattað sambært løgtingslóg um rentuskatt."

2) Í § 25, nr. 3 verður "Løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953," broytt til: "løgtingslóg um rentuskatt".

3) Í § 33, nr. 1, nr. 1 c) og § 46, stk. 3, 4 og 6 verður "løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum við seinni broytingum" broytt til:

"løgtingslóg um rentuskatt".

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 1, litra g affattes således:

"får udbytte fra Færøerne eller rente, som bliver beskattet i henhold til lagtingslov om renteskat."

2) I § 25, nr. 3, ændres "lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953" til: "lagtingslov om renteskatt".

3) I § 33, nr. 1 c) og § 46, stk. 3, 4 og 6 ændres "lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indkomstskat af renter af indestående kapital i færøske banker og sparekasser med senere ændringer" til:

"lagtingslov om renteskat".

4) § 154, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"Hevur persónur, sum er skattskyldugur eftir § 1 í hesi lóg, lingið løn fyri tænastu á einum donskum ella norskum skipi, ið er skrásett í donsku ella norsku altjóða skipaskrásetingini, lækkar samlaði inntøkuskattur hansara við 95% av teirri upphædd, sum lutfalsliga fellur á hesa lønarinntøku."

4) § 154, stk. 3 affattes således:

"Har en person, der er skattepligtig efter § 1 i denne lov, erhvervet lønindkomst ved tjeneste ombord på et dansk eller norsk skib, der er indregistreret i dansk internationalt skibsregister eller norsk internationalt skibsregister, nedsættes den samlede indkomstskat med 95% af det beløb, der forholdsmæssigt falder på denne lønindkomst."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. juli 1992.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. juli 1992.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broyting av løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt eru broytingar tengdar at uppskoti landsstýrisins til nýggja rentuskattalóg.

Við lógarbroytingunum verður skotið upp at gera rentu av innistandandi peningi í føroyskum peningastovnum og postgiro til inntøku, ið førir til avmarkaða skattskyldu fyri móttakara, sum annars ikki er skattskyldugur í Føroyum eftir § 1 í skattalógini.

Tað verður mett at vera eyðsýnt, at vit í so stóran mun sum gjørligt eiga at hava rættin til skatting av inntøkum úr Føroyum, og er tað tí natúrligt, at rætturin til at skatta innistandandi pening er í Føroyum. Her má tó havast í higa tær tvískattaavtalur Føroyar hava við onnur lond, og sum í ávísum førum verða avgerðandi fyri, í hvørjum landi tílík rentuinntøka skal skattast, alt eftir, hvar rentumóttakari sambært hesum sáttmála verður mettur at vera heimahoyrandi.

Til § 2: § 2, litra g verður her broytt til umframt at umfata vinningsbýti úr Føroyum, til eisini at umfata rentu av innistandandi peningi í føroyskum peningastovnum og postgiro.

Pkt. 2. og pkt. 3.: Í pkt. 2 og 3 verða tær verandi lógarávísingarnar til verandi rentuskattalóg broyttar til at vera ávísingar til tí uppskotnu rentuskattalógina.

§ 154, stk. 3 verður broytt soleiðis at persónar, sum hava inntøku undir DIS- ella NIS-skipanini, nú ikki fáa 100% av skattinum endurgoldnan, men í staðin 95%.

174. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður gjørd hendan broyting:

Í § 4, stk. 2, 3 og 5 verður orðingin "løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum við seinni broytingum" broytt til: "løgtingslóg um rentuskatt".

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. juli 1992.

Lagtingslov om ændring af lagtingslov om fastsættelse af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen foretages følgende ændring:

I § 4, stk. 2, 3 og 5 bliver "lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indkomstskat af renter af indestående kapital i færøske banker og sparekasser med senere ændringer" ændret til: "lagtingslov om renteskat".

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. juli 1992.

Viðmerkingar:

Broytingaruppskotið er fylgibroytingar til ta uppskotnu rentuskattalógina.

175. Løgtingslóg um lántøku til landskassan

Uppskot

til

Løgtingslóg um lántøku til landskassan.

§ 1.

Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at taka lán til eina samlaða upphædd svarandi til 210 mió. kr.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om optagelse af lån til landskassen.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til landskassens vegne at optage lån til et samlet beløb, der svarer til 210 mio. kr.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Fíggjarløgtingslógin fyri 1992 vísti eitt rakstrarhall uppá 92 mió. kr. Sambært nýggjar metingar var eitt hall uppá útvið 500 mió væntandi, um einki var gjørt. Eftir at landsstýrið hevur framt ávís búskapartiltøk, verður hallið væntandi 236 mió. kr.

Væntandi er, at útreiðslurnar til fallin veðhald verða munandi størri enn metta 80 milliónirnar, og ætlar landsstýrið í samvinnu við føroysku peningastovnarnar í størri mun at umleggja fallin veðhøld til meiri langfreistað lán. Hetta er mett skilagott, nú restupphæddin av samlaðum almennum veðhaldum er minkað so nógv.

Gongdin í útgjaldingum úr landskassanum og inngjøldum landskassans er sera ójøvn gjøgnum árið, serliga nú búskaparligu fortreytirnar broytast skjótt, mánað fyri mánað. Tað er tí bæði rætt og neyðugt at hava eitt ávíst tiltaksgjaldføri. Landsstýrið søkir tí løgtingið um heimild at taka 70 mió. kr. meira í lán enn økingina í rakstrarhallinum. Hetta hevur m.a. samband við broyttu útgjaldingarnar av bundnu uppsparingunum í 1989.

Lánsheimildin er at skilja sum ein karmur um samlaðu lántøku landskassans og er sostatt ikki avmarkað til ávís endamál ella fíggjarár.

Ískoytt til viðmerkingar til løgtingsmál nr. 175/1991: Løgtingslóg um lántøku til landskassan.

Av tí at frágreiðingin um fíggjartørv landsstýrisins bert stendur í viðmerkingunum til endurskoðaða fíggjarætlan fyri 1992, verður hervið eitt yvirlit yvir somu tøl hjálagt løgtingsmálinum um lántøku til landskassan. Tølini vísa, hvussu komið er fram til samlaða lántøkutørvin uppá 210. mió. kr.

Yvirlit

Hall á fíggjarætlan, mai 1992	237 mió. kr.
Hall á fíggjarlóginni fyri 1992, sum fígging er til:	92 mió. kr.
Eyka hall 1992, væntandi fígging	145 mió. kr.
Eyka gjaldføri	65 mió. kr.
Lántøkuheimild tilsamans	210 mió. kr.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 175/1991: Løgtingslóg um lántøku til landskassan.

Málið er lagt fram av landsstýrintum tann 27. mai 1992 og eftir 1. viðgerð tann 29. mai 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Finnbogi Arge og Flemming Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

176. Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutningi verður í tí í § 2 og § 4 nevnda frumskjal 1 (avgjald á innflutningi) til toll- og vøruskránna gjørdar hesar broytingar:

1. Við nr. 2204.10.00 verður "40% + 25,00 kr. pr ltr."" broytt til: "40% + 35,00 kr. pr. ltr."
2. Við nr. 2204.21.11 verður "40% + 18,00 kr. pr. ltr." broytt til: "40% + 28,00 kr. pr. ltr."
3. Við nr. 22004.21.19 verður "40% + 10,00 kr. pr. ltr." broytt til: "40% + 20,00 kr.pr. ltr."
4. Við nr. 2204.29.11 verður "40% + 18,00 kr. pr. ltr." broytt til: "40% + 28,00 kr. pr. ltr."
5. Við nr. 2204.29.19 verður "40% + 10,00 kr. pr. ltr." broytt til: "40% + 20,00 kr. pr. ltr."
6. Við nr. 2204.30.00 verður "40% + 18,00 kr. pr. ltr." broytt til: "40% + 28,00 kr. pr. ltr."
7. Við nr. 2205.10.00 - 2206.00.00 verður "40% + 18 kr. pr. ltr."

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om fremstillings- og indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 120 af 23. december 1991 om fremstillings- og indførselsafgift foretages i det i § 2 og § 4 nævnte bilag 1 (afgift på indførsel) til told- og varefortegnelsen følgende ændringer:

1. Ved nr. 2204.10.00 ændres "40% + 25,00 kr. pr ltr." til: "40% + 35,00 kr. pr. ltr."
2. Ved nr. 2204.21.11 ændres "40% + 18,00 kr. pr. ltr." til: "40% + 28,00 kr. pr. ltr."
3. Ved nr. 22004.21.19 ændres "40% + 10,00 kr. pr. ltr." til: "40% + 20,00 kr. pr. ltr."
4. Ved nr. 2204.29.11 ændres "40% + 18,00 kr. pr. ltr." til: "40% + 28,00 kr. pr. ltr."
5. Ved nr. 2204.29.19 ændres "40% + 10,00 kr. pr. ltr." til: "40% + 20,00 kr. pr. ltr."
6. Ved nr. 2204.30.00 ændres "40% + 18,00 kr. pr. ltr." til: "40% + 28,00 kr. pr. ltr."
7. Ved nr. 2205.10.00 -n 2206.00.00 ændres "40% + 18 kr. pr. ltr." til:

broytt til: "40% + 28 kr. pr. ltr."

8. Við nr. 2208.10.00 - 2208.90.90 verður "40% + 110,00 kr. pr. ltr." broytt til: "40% + 125,00 kr. pr. ltr."

9. Við nr. 2402.10.11 verður "100 stk. 115,00 kr." broytt til: "100 stk. 125,00 kr."

10. Við nr. 2402.10.15 verður "100 stk. 115,00 kr." broytt til: "100 stk. 125,00 kr."

11. Við nr. 2402.10.50 verður "100 stk. 100,00 kr." broytt til: "100 stk. 110,00 kr." og við nr. 2402.20.00 - 2402.90.00 verður "100 stk. 86,00 kr." broytt til: "100 stk. 100,00 kr."

12. Við nr. 2403.10.00 - 2403.91.00 verður "100,00 kr. pr. kg." broytt til: "150,00 kr. pr. kg."

13. Við nr. 2403.99.10 - 2403.99.90 verður "50,00 kr. pr. kg." broytt til: "100,00 kr. pr. kg."

14. Við nr. 4813.10.00 verður "2 oyra pr. stk." broytt til: "0,05 kr. pr. stk." og við nr. 4813.90.00 verður "2 oyra pr. stk." broytt til: "0,05 kr. pr. stk."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

"40% + 28 kr. pr. ltr."

8. Ved nr. 2208.10.00 - 2208.90.90 ændres "40% + 110,00 kr. pr. ltr." til: "40% + 125,00 kr. pr. ltr."

9. Ved nr. 2402.10.11 ændres "100 stk. 115,00 kr." til: "100 stk. 125,00 kr."

10. Ved nr. 2402.10.15 ændres "100 stk. 115,00 kr." til: "100 stk. 125,00 kr."

11. Ved nr. 2402.10.50 ændres "100 stk. 100,00 kr." til: "100 stk. 110,00 kr." og ved nr. 2402.20.00 - 2402.90.00 ændres "100 stk. 86,00 kr." til: "100 stk. 100,00 kr."

12. Ved nr. 2403.10.00 - 2403.91.00 ændres "100,00 kr. pr. kg." til: "150,00 kr. pr. kg."

13. Ved nr. 2403.99.10 - 2403.99.90 ændres "50,00 kr. pr. kg." til: "100,00 kr. pr. kg."

14. Ved nr. 4813.10.00 ændres "2 øre pr. stk." til: "0,05 kr. pr. stk." og ved nr. 4813.90.00 ændres "2 øre pr. stk." til: "0,05 kr. pr. stk."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar.

Lógaruppskotið um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi er ein partur av ætlan landsstýrisins at útvega meirinntøku til landskassan.

Meirinntøka landskassans hevði við hesum hækkingum fyri alt 1992 givið umleið 16 mió. kr., ella umroknað til rað, ið eftir er av árinum, verður meirinntøkan av hesum hækkingum umleið 9 mió. kr.

Til § 1, pkt. 1-7

Pkt. 1 til 7 í lógaruppskotinum fevnir um vanligt vín og heitvín. Skotið verður upp, at lituravgjaldið á hesum verður hækkað við 10 kr. fyri liturin.

Til § 1, pkt. 8
Pkt. 8 í lógaruppskotinum fevnir um vanligt rúsdrekka. Skotið verður upp, at lituravgjaldið verður hækkað við 15 kr.

Til § 1, pkt. 9-11
Pkt. 9 fevnir um sigarir, sigarillos og sigarettir. Skotið verður upp, at avgjaldið fyri sigarir og sigarillos verður hækkað frá 115 kr. fyri 100 stk. til 125 kr. fyri 100 stk., meðan avgjaldið fyri vanligar sigarettir verður hækkað frá 86 kr. fyri 100 stk. til 100 kr. fyri 100 stk.

Til § 1, pkt. 12 og 13
Pkt. 12 fevnir um tubbak, skrá og snús. Skotið verður upp, at avgjaldið av royki-tubbaki verður hækkað frá 100 kr. fyri kg. til 150 kr. fyri kg., meðan avgjaldið á snúsi verður hækkað frá 50 kr. fyri kg. til 100 kr. fyri kg.

Til § 1, pkt. 14
Pkt. 14 fevnir um sigarettpappír. Skotið verður upp, at eindaravgjaldið verður broytt frá 2 oyra fyri stk. til 0,05 kr. fyri stk.

177. Løgtingslóg um meir-virðisgjald

Uppskot

til

Løgtingslóg um meirvirðisgjald

§ 1.

Samkvæmt hesi lóg skal avgjald rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum.

I. Vavið á avgjaldsskylduni.

§ 2.

Avgjaldsskyldan er galdandi fyri allar nýggjur og brúktar vørur. Gass, vatn,

Lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

Efter denne lovs bestemmelser skal der svares afgift til landskassen i alle led af den erhvervsmæssige omsætning af varer og ydelser samt ved indførsel fra udlandet.

I. Afgiftspligtens omfang.

§ 2.

Afgiftspligten omfatter alle nye og brugte varer. Gas, vand, elektricitet,

ravmagn, hiti o.l. eru at rokna sum vørur.

2. stk. Avgjaldsskyldun er galdandi fyri allar tænastur, undantikið tær, sum eru nevndar í 3. stk.

3. stk. Hesur tænastur eru undantiknar avgjaldsskylduni:

a. Viðgerð á sjúkrahúsi, læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.

b. Almanna umsorgan og stuðul, herímillum vøggustovur, barnagarðar, frítíðarheim, vistarheim, umlættingarheim o.l. privatir ella almennir stovnar.

c. Undirvísing í skúla ella á fróðskaparsetri, faklig útbúgving, herímillum endurútbúgving, og onnur frálæra, ið líkist skúla ella fakligari útbúgving. Undirvísing í máli, tónleiki, fimleiki, handarbeiði, tekning; bókhaldi og maskinskriving er at rokna sum sovorðin útbúgving.

d. Mentunarligt virksemi, herímillum bókusøvn og forngripasøvn, o.l. Tó eru útvarps- og sjónvarpssendingar, sýning av sjónleiki og filmi, konsertir o.l. avgjaldsskyldug.

e. Íróttur og ítróttartiltøk. Tó eru tiltøk, sum professionellir ítróttarluttakarar luttaka í, avgjaldsskyldug, fótbóltsdystir tó bert, tá professionellir leikarar eru á báðum liðum.

varme og lign. anses som varer.

Stk. 2. Afgiftspligten omfatter endvidere alle ydelser, bortset fra de i stk. 3 nævnte.

Stk. 3. Følgende ydelser er undtaget fra afgiftspligten:

a. Hospitalsbehandling, lægevirksomhed, tandlæge- og anden dentalvirksomhed, kiropraktik, fysioterapi og anden egentlig sundhedspleje.

b. Social forsorg og bistand, herunder vuggestuer, børnehaver, fritidshjem, observationshjem, plejehjem og lign. private eller offentlige institutioner.

c. Skole- og universitetsundervisning, faglig uddannelse, herunder omskoling, samt anden undervisning, der har karakter af egentlig skolemæssig eller faglig uddannelse. Undervisning i sprog, musik, legemsøvelser, håndarbejde, tegning, bogføring og maskinskrivning anses for uddannelse af denne karakter.

d. Kulturelle aktiviteter, herunder biblioteker og museer. Afgiftspligtiger dog radio- og fjernsynsudsendelser, teater- og biografforestillinger, koncerter og lign.

e. Sportsaktiviteter og sportsarrangementer. Afgiftspligtige er dog arrangementer, hvor der deltager professionelle sports- og idrætsudøvere, fodboldkampe dog kun, når der deltager professionelle på begge hold.

f. Fólkaflutningur.
g. Tænastur hjá postverkinum. Tó er pakkapostur avgjaldsskyldugur.
h. Útleiga, uppsiting og umsiting av fastari ogn. Tó er útleiga av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.l. avgjaldsskyldug, útleiga av kamari á virki, ið leigar út í tíðarskeið, sum er styttri enn 1 mánað, og útleiga av camping-, parkerings- og reklamuplássi.
i. Tryggingarvirksemi.
j. Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi. Tó er útleiga av bankaboksum avgjaldsskyldug.
k. Lydnuspæl og tílíkt.
l. Rithøvunda- og tónaskaldavirksemi og annað listarligt virksemi.
m. Tænastur beinleiðis í samband við jarðarferðir.
n. Ferðamannastovuvirksemi og ferðamanna leiðbeiningar- og upplýsingarvirksemi.

4. stk. Landsstýrið kann áseta nærri treytir fyri tey undantøk frá avgjaldsskyldu, ið eru nevnd í 3. stk.

5. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri frítøku frá avgjaldsskylduni í sambandi við tiltøk, hvørs yvirskot óskerd fara til vælgerandi endamál ella endamál, sum á annan hátt eru almannagagnlig.

f. Personbefordring.
g. Postvæsenets tjenesteydelser. Afgiftspligtig er dog pakkepost.
h. Udlejning, bortforpagtning og administration af fast ejendom. Afgiftspligtig er dog udlejning af værelser i hoteller, gæstgiverier og lign., udlejning af værelser i virksomheder, der udlejer for kortere tidsrum end 1 måned, samt udlejning af camping-, parkerings og reklameplads.
i. Forsikringsvirksomhed.
j. Bank- og sparekasse- samt finansieringsvirksomhed. Afgiftspligtig er dog udlejning af bankbokse.
k. Lotteri og lign.
l. Forfatter- og komponistvirksomhed samt anden kunstnerisk virksomhed.
m. Ydelser direkte i forbindelse med begravelser.
n. Rejsebureauvirksomhed og turistkontorers oplysnings- og informationsvirksomhed m.v.

Stk. 4. Landsstyret kan fastsætte nærmere betingelser for de i stk. 3 nævnte undtagelser fra afgiftspligten.

Stk. 5. Landsstyret kan fastsætte regler, hvorefter der kan indrømmes fritagelse for afgiftspligten i forbindelse med arrangementer, hvis overskud fuldt ud anvendes til velgørende eller på anden måde almennyttige formål.

II. Virki, ið skulu rinda avgjald.

§ 3.

Avgjald skal rindast av:

a. Tí, sum rekur sjálvstøðugt vinnuvirki við sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

b. Lutafeløgum og øðrum feløgum, hóast felagið bert selur til limir ella bert selur vørur og tænastur hjá limum.

c. Almennum veitingarvirkjum, sum selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur.

d. Øðrum ríkis-, lands- ella kommunalum stovnum í tann mun, teir selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur í kapping við vinnurekandi virki. Latingar frá kommunalum stovni til aðrar stovnar undir somu kommunu eru ikki at rokna sum søla. Tað sama er galdandi fyri latingar frá einum stovni, ið verður rikin í felagsskapi av fleiri kommunum til tær kommunur, sum eru partacigarar í stovninum.

e. Tí, sum skipar fyri uppboðssølum.

2. stk. Í samráð við nevndina, sum er umrødd í § 35, avger landsstýrið, í hvønn mun vinnurekandi virki og feløg skulu rinda avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, tá tær bert verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum ella felagnum, og í hvønn mun kommunur kunnu fáa endurgoldið avgjald samsvarandi hesi lóg av vørum og

II. Virksomheder, der skal svare afgift.

§ 3.

Afgiften svares af:

a. Den, der driver selvstændig erhvervsvirksomhed med afsætning af varer og afgiftspligtige ydelser.

b. Andelsforeninger og andre foreninger, selv om foreningen kun afsætter til medlemmer eller kun afsætter medlemmers varer og ydelser.

c. Offentlige forsyningsvirksomheder, der afsætter varer og afgiftspligtige ydelser.

d. Andre statslige, lands- eller kommunale institutioner, for så vidt de afsætter varer og afgiftspligtige ydelser i konkurrence med erhvervsvirksomheder. Leveranceer fra en kommunal institution til andre institutioner under samme kommune betragtes ikke som afsætning. Det samme gælder leverancer fra en institution, der drives i fællesskab af flere kommuner, til de kommuner, som er parthavere i institutionen.

e. Den, der foranstalter auktioner afholdt.

Stk. 2. Efter samråd med det i § 35 omhandlede nævn bestemmer landsstyret, i hvilket omfang erhvervsvirksomheder og foreninger skal svare afgift af varer og af afgiftspligtige ydelser, når de udelukkende fremstilles eller præsteres til virksomhedens eller foreningens eget brug, og i hvilket omfang kommuner kan få godtgjort af-

avgjaldsskyldugum tænastum, ið verða keyptar í kapping við kommunalt virksemi.

3. stk. Latingar av gassi, vatni, rav magni og hita sum liður í útleigu av húsi ella húsarúmi hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.

4. stk. Søla av egnum listaverki av tí slagnum, ið hoyrir undir vøruflokk 9701-9703 í toll- og vøruskránni hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.

5. stk. Servering og útleiga av kamari á skúlum og skeiðvirksemi í samband við egna frálæru hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.

§ 4.

Tann, sum hevur eina árliga sølu av vørum og tænastum, ið er minni enn 20.000 kr., skal ikki rinda avgjald sambært § 3.

2. stk. Landsstýrið kann áseta reglur, soleiðis at onnur virki verða fritikin fyri at rinda avgjald sambært § 3.

§ 5.

Tann, sum sambært §§ 3-4 skal rinda avgjald, skal fráboða virki sítt til skrásetingar hjá tollvaldinum. Hetta er eisini galdandi fyri útlendsk virki. Hevur eitt virki ikki deild ella tílíkt her á landi, skal tað skrásetast við persóni, ið er búsitandi her á landi, ella við virki, sum hevur sølustað her á landi.

2. stk. Hevur viðkomandi fleiri virki,

giften i henhold til denne lov af varer og afgiftspligtige ydelser, der købes i konkurrence med kommunale virksomheder.

Stk. 3. Levering af gas, vand, elektricitet og varme som led i udlejning af hus eller husrum medfører ikke pligt til at svare afgift.

Stk. 4. Kunstneres salg af egne kunstværker af den art, der hører under told- og varefortegnelsens position 9701-9703, medfører ikke pligt til at svare afgift.

Stk. 5. Skolers og kursusvirksomheders udlejning af værelser og servering i forbindelse med egen undervisning medfører ikke pligt til at svare afgift.

§ 4.

Den, hvis omsætning af varer og afgiftspligtige ydelser ikke overstiger 20.000 kr. årlig, skal ikke svare afgift efter § 3.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler, hvorefter andre grupper af virksomheder fritages for at svare afgift efter § 3.

§ 5.

Den, der efter §§ 3-4 skal svare afgift, skal anmelde sin virksomhed til registrering hos toldvæsenet. Dette gælder også udenlandske virksomheder. Såfremt virksomheden ikke har filial eller lignende her i landet, skal den registreres ved en person, der er bosiddende her i landet, eller ved en virksomhed, der har forretningssted her i landet.

Stk. 2. Har den pågældende flere

skulu hesi fráboðast til skráseting undir einum. Verður roknskapur førdur fyri hvørt virki sær, kunnu virkini kortini eftir áheitan verða skrásett hvørt sær.

3. stk. Skrásetingarskyldug virki, sum ikki hava sama ánara, kunnu eftir áheitan verða skrásett undir einum.

4. stk. Virki, sum verða skrásett undir einum, eru at rokna sum eitt virki.

5. stk. Fráboðan til skrásetingar skal fara fram í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn virksemið byrjar. Broytingar í ánaraviðurskiftum, leiðsluábyrgd ella staði skulu fráboðast áðrenn 8 dagar eftir, at broytingin er farin fram.

6. stk. Skrásett virki fáa útflýggjað prógv um skráseting.

7. stk. Virki, tó eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, skulu fráboða virki sítt til skrásetingar hjá tollvaldinum í seinasta lagi 31. oktober 1992.

virksomheder, anmeldes disse til registrering under ét. Såfremt der føres særskilt regnskab for de enkelte virksomheder, kan virksomhederne dog på begæring registreres hver for sig.

Stk. 3. Registreringspligtige virksomheder, der ikke har samme ejer, kan efter begæring registreres under ét.

Stk. 4. Virksomheder, der registreres under ét, betragtes som én virksomhed.

Stk. 5. Anmeldelse til registrering skal ske senest 8 dage, før virksomheden påbegyndes. Ændringer i en virksomheds ejerforhold, ansvarlige ledelse eller beliggenhed skal anmeldes inden 8 dage efter, at ændringen er sket.

Stk. 6. Til de registrerede virksomheder udstedes et bevis for registreringen.

Stk. 7. Virksomheder, der er registreringspligtige i henhold til denne lov, skal senest den 31. oktober 1992 tilmelde virksomheden til registrering hos toldvæsenet.

§ 6.

Landsstýrið kann áseta reglur um skráseting eftir áheitan frá virkjum, sum selja aðrar tænastur enn tær, ið sambært § 2 eru avgjaldsskyldugar (sjálvboðin skráseting).

2. stk. Virki, ið eru sjálvboðin skrásett, skulu rinda avgjald av sølu av tænastum, sum eru umfevndar av sjálvbodnu skrásetingini.

3. stk. Sjálvboðin skráseting kann í fyrsta lagi halda uppat 2 ár eftir skrásetingina.

§ 6.

Landsstyret kan fastsætte regler, hvorefter virksomheder, der afsætter andre ydelser end dem, der er afgiftspligtige efter § 2, efter anmodning kan registreres (frivillig registrering).

Stk. 2. Frivilligt registrerede virksomheder skal svare afgift af omsætningen af ydelser, der omfattes af den frivillige registrering.

Stk. 3. Frivillig registrering kan tidligst ophæves 2 år efter registreringen.

III. Avgjaldsskylduga virðið.

§ 7.

Við søla av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum er avgjaldsskylduga virðið, samsýningin, ikki íroknað avgjaldið sambært hesi lóg.

2. stk. Við í avgjaldsskylduga virðið skal roknast:

a. Tey avgjøld sambært øðrum avgjaldslógum, sum eru uppkravd í undanfarnum søluliðum, ella sum skulu rindast í samband við innflutning úr útlondum, ella sum eitt virki hevur skyldu at gjalda í samband við viðkomandi søla.

b. Tær útreiðslurnar til pakking, sending, trygging og tílíkt, sum eru við í prísinum, ella sum latarin krevur serstakt gjald fyri frá móttakaranum.

c. Íbindingar- og stovningargjald og aðrar upphæddir, sum latarin krevur frá móttakaranum sum treyt fyri, at vørur og avgjaldsskyldugar tænastur kunnu verða latnar.

d. Umboðsløn o. t. og uppboðssøluløn.

e. Kassaavsláttur og annar avsláttur, ið er treytaður av krøvum, sum ikki eru lokin við latingina (fakturingina).

f. Ískoyti til avgjalding og líggingo.t.

3. stk. Rentur, ið vera roknaðar av tí til eina og hvørja tíð skylduga partinum av keypspeninginum, kunnu haldast

III. Afgiftspligtig værdi.

§ 7.

Ved afsætning af varer og afgiftspligtige ydelser er den afgiftspligtige værdi vederlaget, heri ikke indbefattet afgiften efter denne lov.

Stk. 2. I den afgiftspligtige værdi medregnes:

a. De afgifter i henhold til andre afgiftslove, der er opkrævet af tidligere omsætningsled, eller som svares i forbindelse med indførsel fra udlandet, eller som det påhviler virksomheden at betale i forbindelse med den pågældende omsætning.

b. De udgifter til emballage, forsendelse, forsikring og lign., som indgår i prisen, eller for hvilke leverandøren afkræver modtageren særskilt betaling.

c. Tilslutnings- og oprettelsesafgifter og andre beløb, som leverandøren afkræver modtageren som betingelse for levering af varer og afgiftspligtige ydelser.

d. Agentprovision og lign. samt auktionssalær.

e. Kasserabatter og andre rabatter, der er betinget af vilkår, som ikke er opfyldt ved leveringen (faktureringen).

f. Afbetalingstillæg, finansieringstillæg og lign.

Stk. 3. Renter, der beregnes af den til enhver tid skyldige del af købesummen, kan holdes uden for den afgifts

uttan fyri avgjaldsskylduga virðið, treytað av, at tað er ávíst í keypssáttmálanum ella fylgiskjali viðvíkjandi gjalding, hvussu stórur partur rentan er av hvørjari einstakari gjalding.

§ 8.

Fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða brúktar av handhavaranum av virkinum, er avgjaldsskylduga virðið keypsprísurin ella framleiðsluprísurin, ikki froknað avgjaldið sambært hesi lóg, javnber tó 3. stk. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða brúktar til endamál, sum ikki viðvíkja sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum hjá virkinum, ella til endamál, sum nevnt í § 16, 3. stk. Við í avgjaldsskylduga virðið skulu roknast avgjøld, sum nevnt í § 7, 2. stk. punkt a. Hevur virkið sjálvt innflutt vørurnar frá útlondum, verður eitt sambært reglunum í § 27, 2. stk. ásett virði við møguligum tolli løgdum aftrat, roknað sum keypsprísurin.

2. stk. Fyri vørur og avgjaldsskylduga tænastur, sum heilt ella fyri ein part verða latnar móti aðrari gjalding enn við peningi (býtishandil), er avgjaldsskylduga virðið vanligi prísurin hjá virkinum við sølu av viðkomandi vøru ella tænastu. Er eingin slíkur vanligur søluprísur, er avgjaldsskylduga virðið ein roknaður søluprísur, sum skal fevna um allar útreiðslur og vinning, sum vanliga verða roknað við í avgjaldsskylduga virðið fyri vørur ella tænastur av viðkomandi slagi.

3. stk. Fyri vørur og avgjaldsskylduga tænastur, sum eitt virki nýtur við

pligtige værdi på betingelse af, at det af købekontrakten eller bilag vedrørende betalingerne fremgår, hvor meget renten udgør af de enkelte betalinger.

§ 8.

For varer og afgiftspligtige ydelser, der anvendes af virksomhedens indehaver, er den afgiftspligtige værdi indkøbsprisen eller fremstillingsprisen, heri ikke indbefattet afgiften efter denne lov, jfr. dog stk. 3. Det samme gælder varer og afgiftspligtige ydelser, der anvendes til formål, som ikke vedrører virksomhedens omsætning af varer og afgiftspligtige ydelser, eller til formål som nævnt i § 16, stk. 3. I den afgiftspligtige værdi medregnes afgifter som anført i § 7, stk. 2, punkt a. Har virksomheden selv indført varerne fra udlandet; anses en i overensstemmelse med reglerne i § 27, stk. 2, fastsat værdi tillagt eventuel told som indkøbsprisen.

Stk. 2. For varer og afgiftspligtige ydelser, der helt eller delvis leveres mod anden betaling end penge (byttehandel), er den afgiftspligtige værdi virksomhedens almindelige pris ved afsætning af den pågældende vare eller ydelse. Findes der ikke en sådan almindelig salgspris, er den afgiftspligtige værdi en kalkuleret salgspris, der skal omfatte samtlige de omkostninger og den avance, der i almindelighed indgår i den afgiftspligtige værdi for varer eller ydelser af den pågældende art.

Stk. 3. For varer og afgiftspligtige ydelser, som en virksomhed anvender

bygging av fasturi ogn til nýtslu hjá handhavantum av virkinum, verður avgjaldsskylduga virðið ásett á tann hátt, sum er nevndur í 2. stk. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum virkið brúkar við bygging av fastari ogn fyri egna rokning, tá ið ognin skal nýtast til endamál, sum ikki viðvíkja keypi og sølu hjá virkinum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, herímillum til sølu ella útleigu, ella til endamál sum nevnt í § 16, 3. stk.

§ 9.

Eru felags áhugamál millum lataran og móttakaran av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, t.d. soleiðis, at annar er búskaparligt áhugaður í virki ella ogn hjá hinum partinum, kann landsstýrið krevja, at avgjaldsskylduga virðið skal ásetast á tann hátt, sum er ásettur í § 8, 2. stk.

2. stk. Fyri bólkar av virkjum kann landsstýrið áseta fyridømispeningagrundarlag, sum vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið vera nýttar sum nevnt í § 8, 1. stk., kunnu avgjaldsavgreiðast sambært. Í førum, tá ið avgjaldsskylduga virðið verður ásett eftir eini útrokning, kunnu somuleiðis ásetast reglur um avgjaldsavgreiðslu sambært fyridømispeningagrundarlagd.

§ 10.

Við sølu av brúktum persónmotorakførum og av vøru- og lastmotorakførum við loyvdari totalvekt ikki yvir 4 tons kann ein sølumaður - tá avgjald ikki er fakturerað sambært hesi lóg við

ved opførelse af fast ejendom til brug for virksomhedens indehaver, fastsættes den afgiftspligtige værdi på den i stk. 2 anførte måde. Det samme gælder varer og afgiftspligtige ydelser, som virksomheden anvender ved opførelse af fast ejendom for egen regning, når ejendommen skal benyttes til formål, som ikke vedrører virksomhedens omsætning af varer og afgiftspligtige ydelser, herunder til salg eller udlejning, eller til formål som nævnt i § 16, stk. 3.

§ 9.

Består der mellem leverandøren og modtageren af varer og afgiftspligtige ydelser et interessefællesskab, f.eks. således, at den ene er økonomisk interesseret i den anden parts virksomhed eller ejendom, kan landsstyret påbyde, at den afgiftspligtige værdi skal fastsættes på den i § 8, stk. 2, anførte måde.

Stk. 2. Landsstyret kan for grupper af virksomheder fastsætte standardbeløb, hvorefter varer og afgiftspligtige ydelser, der anvendes som nævnt i § 8, stk. 1, kan afgiftsberigtiges. I tilfælde, hvor den afgiftspligtige værdi opgøres på grundlag af en kalkulation, kan der ligeledes fastsættes regler om afgiftsberigtigelse efter standardbeløb.

§ 10.

Ved afsætning af brugte personmotorkøretøjer og af vare- og lastmotorkøretøjer med tilladt totalvægt ikke over 4 tons kan en forhandler - når der ikke ved overdragelsen til forhandleren er

útflýggjan til sølumannin - avgjaldsavgreiða akfarið grundað á eitt avgjaldsskyldugt virði, sum er 83,33% av munin millum keypsprísin og søluprísin, avgjaldið roknað. Fer søluprísurin ikki upp um keypsprísin, verður einki avgjald roknað.

2. stk. Virki, ið leiga út motorakfør, og koyriskúlar, kunnu við sølu av motorakførum, sum hava verið nýtt til útleigu ella koyrilæru, avgjaldsavgreiða hesi eftir søluprísinum, frádrigin nærri ásett frádráttarprosent. Landsstýrið ásetir frádráttarprosentini við fyriliti til tann partin av prísinum, sum avgjaldið sambært lóg um skrásetingargjald av akførum v. m. er.

3. stk. Verður avgjaldið roknað sambært grundarlagnum í 1. ella 2. stk., má hvørki avgjaldsupphæddin ella nakað annað, sum ger tað møguligt at rokna avgjaldsupphæddina, verða nevnt í fakturanum fyri viðkomandi sølu.

4. stk. Sum brúkt akfør eru at rokna akfør, sum, tá ogning fer fram, eru ella hava verið skrásett her á landi, javnber ferðslulógina.

IV. Vavið á avgjaldsskyldugari sølu.

§ 11.

Avgjaldsskyldug søla hjá skrásettum virkjum fevnir um latingar móti gjalding og vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum eru framleiddar ella umboðaðar á virkinum, og sum verða tiknar í nýtslu av handhavanum á virki-

faktureret afgift efter denne lov - afgiftsberigtige køretøjet på grundlag af en afgiftspligtig værdi, der udgør 83,33 % af forskellen mellem indkøbsprisen og salgsprisen indbefattet afgiften. Overstiger salgsprisen ikke indkøbsprisen, beregnes ingen afgift.

Stk. 2. Udlejningsvirksomheder og køreskoler kan ved afsætning af motorkøretøjer, der har været anvendt til udlejning eller køreundervisning, afgiftsberigtige disse på grundlag af salgsprisen reduceret med nærmere fastsatte reduktionsprocenter. Landsstyret fastsætter reduktionsprocenterne under hensyn til den andel i prisen, som afgiften i henhold til lov om registreringsafgift af motorkøretøjer m. v. udgør.

Stk. 3. Beregnes afgiften på det i stk. 1 eller stk. 2 anførte grundlag, må der ikke i fakturaen for det pågældende salg anføres afgiftsbeløb eller anden angivelse, hvoraf afgiftsbeløbets størrelse kan udregnes.

Stk. 4. Som brugte køretøjer anses køretøjer, der på tidspunktet for erhvervelsen er eller har været registreret her i landet, jf. færdselsloven.

IV. Den afgiftspligtige omsætnings omfang.

§ 11.

De registrerede virksomheders afgiftspligtige omsætning omfatter leverancer mod betaling samt de af virksomheden fremstillede eller forhandlede varer og afgiftspligtige ydelser, som tages i anvendelse af virksomhedens indehaver.

Stk. 3. Den, der begår en af de nævnte overtrædelser med forsæt til at undrage landskassen afgift i overensstemmelse med § 24, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

Stk. 4. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 34.

Skønnes en overtrædelse ikke at ville medføre højere straf end bøde, kan toldvæsenet eller den, som toldvæsenet bemyndiger, tilkendegive den pågældende, at sagen kan afgøres uden retslig forfølgning, såfremt han erkender sig skyldig i overtrædelsen og erklærer sig rede til inden for en nærmere angivet frist at betale en bøde.

Stk. 2. Med hensyn til den i stk. 1 nævnte tilkendegivelse finder bestemmelsen i retsplejeloven om indhold af anklageskrift i politisager tilsvarende anvendelse.

Stk. 3. Betales bøden i rette tid, eller bliver den efter vedtagelse inddrevet eller afsonet, bortfalder videre forfølgning.

Stk. 4. Når sager om de i § 33 nævnte overtrædelser indbringes for domstolene, behandles de som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitler 72 og 73 kan anvendes i samme omfang som i statsadvokatsager.

XIII. Aðrar reglur.

§ 35.

Landsstýrið setir eina nevnd við 3 limum, ið hava fjølbroyttan kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti.

2. stk. Í minsta lagi ein av limunum í nevndini skal vera løgfrøðingur og ikki hava sítt dagliga yrki hjá tí almenna, og verður hesin, ella eru teir fleiri, ein av hesum, formaður í nevndini.

3. stk. Við viðgerð av málum, ið sambært nevndarinnar metan krevja serligan starvsgreinaligan, tøknifrøðiligan ella handilsligan kunnleika, kann nevndin boðsenda kønum ráðgevum.

4. stk. Nevndin hevur endaliga fyrisitingarliga avgerð um:

a. Spurningar um vavið á avgjaldsskylduni.
b. Spurningar um avgjaldsskylduga virðið.
c. Spurningar um vavið á fritøkuni, sum er nevnd í § 12, 1. stk., punkt f og h, og § 27, 4. og 5. stk.
d. Spurningar sambært § 15, 3. stk. og § 16, 3. stk. viðvíkjandi inngangandi avgjaldi.
e. Spurningar um, hvat tað er almennt veitingarvirki sambært § 3, 1. stk., punkt e.
f. Klagur um tær ásetingar, ið sambært § 32, 2. stk. verða gjørdar eftir meting av tollvaldinum.

5. stk. Tann, sum hevur biðið nevndina um eina avgerð, kann eftir áheitan fáa atgongd til munnliga at framleggja

XIII. Andre bestemmelser.

§ 35.

Landsstyret nedsætter et nævn med 3 medlemmer, som har alsidig kundskab til erhvervslivets forhold og til administration.

Stk. 2. Mindst et af medlemmerne i nævnet skal være jurist og ikke være beskæftiget inden for det offentlige, og denne, eller hvis der er flere, en af disse, bliver nævnets formand.

Stk. 3. Ved behandling af sager, der efter nævnets skøn kræver speciel branchemæssig, teknisk eller handelsmæssig indsigt, kan nævnet tilkalde sagkyndige rådgivere.

Stk. 4. Nævnet har den endelige administrative afgørelse af:

a. Spørgsmål om afgiftspligtens omfang.
b. Spørgsmål om den afgiftspligtige værdi.
c. Spørgsmål om omfanget af de i § 12, stk. 1, punkt f og h, og § 27, stk. 4 og 5, omhandlede fritagelser.
d. Spørgsmål i henhold til § 15, stk. 3, og § 16, stk. 3, om den indgående afgift.
e. Spørgsmål om, hvad der er offentlig forsyningsvirksomhed efter § 3, stk. 1, punkt e.
f. Klager over de af toldvæsenet i henhold til § 32, stk. 2, foretagne skønsmæssige ansættelser.

Stk. 5. Den, der har anmodet nævnet om en afgørelse, har efter begæring adgang til mundtligt at fremstille sagen

málið fyri nevndina. Í sovorðnum førum skal umboð fyri Føroya Tollstovu eisini hava henda møguleika.

6. stk. Starvsskipanin hjá nevndini og reglur um kunngerð av avgerðum, ið nevndin tekur, verða ásett av landsstýrinum.

§ 36.

Landsstýrið ásetir reglur um endurrindan av avgjaldi, sum útlendsk virki hava goldið við keyp, tilevning v. m., goymslu ella við flutning av vørum, ið verða útfluttar til útlond.

§ 37.

Avgjald sambært hesi lóg fer í landskassan.

2. stk. Av hvørjari avgjaldsavrokning sambært § 15, ið virki skulu rinda kr. 1000 ella meira av, fer 1,2% av avgjaldsupphæddini í grunn, hvørs enda mál við undantak av teimum í § 13, 6. stk. nevndu førum er at halda landskassan skaðaleysan fyri staðfestum tapi sambært hesi lóg.

§ 38.

Tollvaldinum, eins væl og limum í tí í § 35 nevndu nevndini, er bannað, undir ábyrgd í borgarligari revsilóg fyri Føroyar, at siga óviðkomandi frá upplýsingum viðvíkjandi privatum, fíggjar og vinnuviðurskiftum, sum teir fáa at vita, meðan teir røkja starv sítt sambært hesi lóg. Tað sama hevur gildi fyri tað hjálparfólk, sum starvast hjá tollvaldinum og annars hvønn og ein, sum hevur gjørt avtalu við tað almenna um at átaka sær eitt arbeiði og fær at vita

for nævnet. I såfald skal en repræsentant fra Føroya Tollstovu også have denne mulighed.

Stk. 6. Nævnets forretningsorden samt regler om bekendtgørelse af afgørelser, der træffes af nævnet, fastsættes af landsstyret.

§ 36.

Landsstyret fastsætter bestemmelser om godtgørelse af afgift, som udenlandske virksomheder har betalt ved køb, bearbejdning m. v., opbevaring eller transport af varer, der udføres til udlandet.

§ 37.

Afgift i henhold til denne lov tilfalder landskassen.

Stk. 2. Af enhver afgiftsafregning i henhold til § 15, for hvilken virksomheder skal betale kr. 1000 eller derover, tilfalder 1,2% en fond, hvis formål med undtagelse af de i § 13, 6. stk. nævnte tilfælde er at holde landskassen skadesløs for konstateret tab i henhold til denne lov.

§ 38.

Toldvæsenet såvel som det i § 35 nævnte råds medlemmer, skal under ansvar efter borgerlig straffelov for Færøerne iagttage ubetinget tavshed over for uvedkommende vedrørende private, økonomiske og erhvervsmæssige oplysninger, som de under varetagelse af deres funktioner efter denne lov kommer til kundskab om. Det samme gælder de hos skattemyndighederne ansatte eller af dem antagne medhjælpere samt iøvrigt enhver, der som følge

um slík viðurskifti. Er avtalan gjørd við eitt virki, fevnir tagnarskyldan um øll tey í virkinum, sum fáa at vita um slík viðurskifti.

2. stk. Líkningarráð Føroya og Hagstovan verða ikki mett at vera óviðkomandi sambært 1. stk.

XIV. Skiftis- og ígildissetanarreglur

§ 39.

Landsstýrið kann áseta neyðugar reglur fyri fremjing av lógini, herímillum skipa fyri neyðugum eftirlitsfyriskipanum.

§ 40.

Virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, og sum hava uppgjørt goymsluna pr. 31. desember 1992, áðrenn 1. februar 1993, fáa 80% av innflutningsgjaldinum sambært lóg nr. 119 frá 23. desember 1991, ið er goldið fyri vørur, ið eru innflutar til víðari sølu í 1992, og sum ikki eru seldar áðrenn 1. januar 1993, endurgoldið í 1993.

2. stk. Innflutningsgjaldið sambært hesi grein verður endurgoldið í 5 pørtum og útgoldið í samsvari við avrokningartíðarskeiðið sambært § 20, fyrstu ferð í samband við annað avrokningartíðarskeið í 1993.

3. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um krøv, ið skulu lúkast, áðrenn afturrindan sambært hesi grein verður framd.

af et i henhold til aftale med det offentlige pátaget arbejde kommer til kundskab om sádanne forhold. Er aftalen indgået med en virksomhed, omfatter tavshedspligten alle, der under deres arbejde i virksomheden får kundskab om sádanne forhold.

Stk. 2. Som uvedkommende i henhold til stk. 1, regnes ikke Líkningarráð Føroya og Hagstovan.

XIV. Overgangs- og ikrafttrædelsesbestemmelser.

§ 39.

Landsstyret kan fastsætte de fornødne regler til gennemførelse af loven, herunder foreskrive de nødvendige kontrolforanstaltninger.

§ 40.

Virksomheder, der er registreringspligtige i henhold til denne lov, og som har opgjort lager pr 31. december 1992 før 1. februar 1993, får 80% af indførselsafgift, som er betalt for varer, der er importeret i henhold til lov nr. 119 af 23. december 1991 til videre salg i 1992, og som ikke er solgt før 1. januar 1993, tilbagebetalt i 1993.

Stk. 2. Indførselsafgift i henhold til denne bestemmelse refunderes i 5 rater og udbetales i overensstemmelse med afregningsperioden jfr. § 20, første gang i overensstemmelse med anden afregningsperiode i 1993.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om betingelser, som skal være opfyldt, forinden tilbagebetaling kan finde sted.

§ 41.

Hendan lóg kemur í gildi 1. januar 1993. Tó kemur § 5 í lógini í gildi 1. oktober 1992.

2. stk. Virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært § 5, skulu fráboða seg til skrásetingar í seinasta lagi 20. november 1992.

§ 41.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993. Dog træder § 5 i loven i kraft 1. oktober 1992.

Stk. 2. Virksomheder, som er registreringspligtige i henhold til § 5, skal anmelde sig til registrering senest den 20. november 1992.

§ 42.

Samstundis sum hendan lóg kemur í gildi, fer úr gildi løgtingslóg nr. 119 frá 23. desember 1991 um innflutningsgjald og tær kunngerðir - burtursæð frá kunngerð nr. 67 frá 26. juni 1991 um veiting av undantaksloyvi at fáa tollskyldugar vørur útflýggjaðar, áðrenn gjaldið er goldið - ið eru settar sambært lóg nr. 9 frá 27. februar 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald og lóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinni broytingum um cykainnflutningsgjøld, og sum ikki fóru úr gildi, tá ið lóg nr. 119 frá 23. desember 1991 um innflutningsgjøld kom í gildi.

§ 42.

Samtidigt med at denne lov træder i kraft, ophæves lagtingslov nr. 119 af 23. desember 1991 om indførselsafgift og de bekendtgørelser - med undtagelse af bekendtgørelse nr. 67 af 26. juni 1991 om meddelelse af undtagelsesret til at udlevere toldpligtige varer, før afgiften er betalt, der er udstedt med hjemmel i lov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift og lov nr. 32 af 19. mai 1979 med senere ændringer om ekstraindførselsafgift, og som ikke blev ophævet, da lov nr. 119 af 23. desember 1991 om importafgift trådte i kraft.

Viðmerkingar.

Løgtingslóg um meirvirðisgjald er annar og seinni partur av stóru broytingini í føroysku toll- og avgjaldsskipanini.

Orsøkin til broytingina í føroysku toll- og avgjaldsskipanini er fyrst og fremst bandilssáttmálin við EF og nú eisini EFTA, har ið Føroyar hava:

1) bundið seg til frá 1. januar 1992 at gera eina tollskipan, ið lýkur GATT-skyldurnar hjá Danmark, og sum veitir vørum við uppruna í EF tollfrítøku,

2) bundið seg til frá 1. januar 1993 at taka núverandi skipan við figgjarinnflutningsgjøldum og framleiðslugjøldum av fyri í staðin at gera eina nýggja skipan við óbeinleiðis skattum grundað á:

a) eitt meirvirðisgjald grundað á somu meginreglur sum tær, sum Felagsskapurin tilmælir sínum limalondum, harundir ikki at gera mismun á innflutum vørum, og

b) eina skipan við nýtslugjaldi, lagt javnt á innlendis framleiðslu og innfluttar vørur.

Til I er at siga, at hesin partur varð settur í gildi 1. februar 1992.

Í samband við at nýggj tolllóg varð gjørd, varð neyðugt at gera ymiskar broytingar í innflutningsgjøldunum, soleiðis at hesi komu at fylgja upp tingini í toll- og vøruskránni. Serligu og eyka innflutningsgjøldini vórðu tí umløgd til eitt gjald sambært lóg, ið fekk heitið "løgtingslóg um innflutningsgjald".

Henda lóg, ið vanliga fevnir um eitt gjald uppá 33%, ella 6% um tað t.d. er tilfar til fiskivinnuna, fellur við ígildissetanini av meirvirðisgjaldinum burtur.

Annars kann viðmerkjast, at teir tropulleikar, ið tóku seg upp, viðvíkjandi (GATT)-tolli av triðjalands vørum, eitt nú vørur frá EFTA-londunum, verða loystir við, at fríhandilsavtalurnar við hesi lond væntandi koma uppá plass á sumri í ár.

Viðvíkjandi 2. a, er at siga, at meirvirðislóggávurnar í flest londum í dag líkjast í stóran mun, av tí at meginreglurnar í meirvirðisgjaldinum eru eins.

Meirvirðisgjaldsskipanin snýr seg í stuttum um, at tann, ið selur vørur ella tænastur, sum ikki eru umfevndar av § 2, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini, skal skrásetast hjá toltvaldinum.

Tá ið viðkomandi selur eina vøru ella tænastu, skal meirvirðisgjald uppkrevjast. Verður vøran ella tænastan útflutt, skal einki meirvirðisgjald uppkrevjast. Hinvegin er eisini meirvirðisgjald á vørum, ið virkið hevur keypt ella innflutt.

Við endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði, tey verða 6 um árið, ger virkið upp, hvussu nógv, ið er keypt, og hvussu stórur partur av hesum er meirvirðisgjald. Virkið ger eisini upp, hvussu nógv ið er selt, býtt sundur á innanlands sølu og útflutning, og hvussu stórur partur av hesum er meirvirðisgjald. Við at draga tølini frá hvørjum øðrum fæst so at vita, um virkið hevur keypt fyri meir, enn tað hevur selt fyri, ella um tað hevur selt fyri meir, enn tað hevur keypt fyri.

Er meirvirðisgjald á søluni størri enn meirvirðisgjald á keypinum, skal virkið rinda hetta í landskassan. Hinvegin fær virkið meirvirðisgjaldið endurgoldið úr landskassanum, um meirvirðisgjald av keypinum er størri enn meirvirðisgjald av søluni í einum avgjaldstíðarskeiði.

Hetta er vanliga, tá ið eitt virki er undir stovnan, tí tað tá ikki hevur nakra sølu, ella í førum, tá ið virkið útflytir alla sína framleiðslu. Í sovorðnum førum uppkrevja tey ikki meirvirðisgjald av søluni og fáa endurgoldið alt tilfakturerað meirvirðisgjald.

Kjarnan í meirvirðisgjaldinum er, at sama avgjald verður uppkravt av einari innfluttari vøru sum av vøru, ið verður framleidd og seld innanlands. Tað merkir, at hetta er ein skipan, ið kann nýtast í einari fríhandilsskipan við onnur lond og felagsskapir.

EF hevur síðani 1977 arbeitt við at tillaga meirvirðisgjaldslóggávurnar í sínum limalondum. Tað týdningarmesta direktivið í hesum sambandi er 6. meirvirðisgjaldsdirektiv. Eitt direktiv er bindandi fyri tey einstøku EF-londini, men londini kunnu sjálvi gera av, hvussu tey gjøgnumføra tjóðskaparligar lógir, ið eru neyðugar fyri at gjøgnumføra direktivið.

Direktivið ásetir millum annað reglur um, hvat tey einstøku londini kunnu varðveita avgjaldsfrítt, og hvat tey ikki kunnu varðveita avgjaldsfrítt. T.d. er ásett, at søla av fastari ogn kann vera avgjaldsfrí.

Orsøkin til tillagingina er fyrst og fremst, at londini skulu kappast á jøvnum føti, og at tað tí er umráðandi, at tey virka undir somu avgjaldsskipanum. Harnæst rinda EF-londini til ein felags kassa. Gjaldið verður millum annað útroknað eftir meirvirðisgjaldsinntøkunum í teimum einstøku londunum. Tað er tí neyðugt, at útrokningargrundarlagið fyri gjaldinum er eins í øllum limalondum.

Orsakað av, at tann innari marknaðurin ikki kann gerast veruligur, fyrr enn avgjaldslóggávan í EF er tillagað, hevur hetta arbeiði gingið sera skjótt, aftaná at avgjørt varð at gera ein innara marknað, ið skal koma í gildi 1. januar 1993, so at kalla øll lond í EF nú hava somu avgjaldslóggávu. Tó hava nøkur lond fleiri meirvirðisgjaldssatsir, og meirvirðisgjaldssatsirnir eru ikki eins í teimum einstøku limalondunum. Í 1987 samtykti EF-Kommissiónin tó, at stig skuldi takast til eisini at tillaga meirvirðisgjaldssatsirnar. 6. meirvirðisgjaldsdirektiv viðgerð annars ikki henda spurning.

Sambært uppskotinum kunnu londini hava tveir satsir. Ein vanligan sats, ið verður settur millum 14% og 20% og ein niðursettan sats, ið verður settur millum 4% og 9%. Vøruøkið, ið kemur undir tann niðursetta satsin, fevnir t. d. um matvørur, ravmagn, heilivág og bøkur.

Landsstýrisins uppskot til meirvirðisgjald fylgir teirri skipan, ið EF tilmælir sínum limalondum; tó verður skotið upp, at bert ein satsur verður brúktur. Hetta verður meira einfalt at umsita. Ein kompensatión á einstøkum økjum eigur í staðin fyri at nýta fleiri meirvirðisgjaldssatsir, at verða givin á annan hátt. Hetta er eisini tann skipan, sum Ísland, ið setti eina meirvirðisgjaldsskipan á stovn 1. januar 1990, hevur valt.

Annars kann sigast, at meirvirðisgjaldslóggávan í teimum londum, ið ikki eru limir í EF, t.d. í Noregi, Svøríki, Íslandi og Finnlandi, líkist meirvirðisgjaldslóggávuni í EF.

Hesi lond tóku eisini stig til at tillaga teirra avgjaldslóggávur í 1987. Hvussu hetta arbeiði verður í framtíðini er ivingarsamt, tí at aftaná at Svøríki og Finnland hava søkt um limaskap í EF, verða hesi lond noydd at tillaga teirra skipan sambært galdandi EF-reglum.

Tað eru eisini aðrar orsøkir enn handilssáttmálin við EF til, at neyðugt er at broyta óbeinleiðis skattaskipanina. Núgaldandi innflutningsgjaldsskipan, sum

meirvirðisgjaldsskipanin kemur í staðin fyri, byggir á lóg um serligt innflutningsgjald frá 1961 og lóg um eyka innflutningsgjald frá 1979. Hesi gjøld vóru sokallað fíggjarinnflutningsgjøld. Tað vil siga, tey vóru áløgd, fyri at landskassin kundi fáa nakrar inntøkur.

Avgjøldini verða bert løgd á vørur, ið verða innfluttar, tað merkir, tænasturnar eru frítar, hvat óbeinleiðis skatti viðvíkur.

Fyri at føroysk framleiðsla kundi kappast við útlendska framleiðslu, varð gjørd ein skipan, har ið virki, ið innfluttu vørur til framleiðslu, kundu fáa tær innfluttar við einum lægri tolli. Eisini er tilfar til fiskivinnuna í summum førum tollfrítt.

Orsakað av at avgjaldið bert verður kravt av vørum, ið verða innflnttar, hevur avgjaldsgrundarlagið verið sera lítið. Tað eru tær somu vørurnar, ið hava goldið avgjaldið. T. d. verða matvørur í dag tollaðar við 33%, meðan fyri klæði umframt tey 33% skal rindast 15% í avgjaldi, soleiðis at samlaða avgjaldið her er 48%.

Harnæst hevur avgjaldið verið uppkravt av fakturaprísinum, soleiðis at virðisgrundarlagið, tað ið avgjald skal roknast av, hevur verið sera lítið. Við meirvirðisgjaldsskipanini verður hetta broytt, tí her skal bæði gjaldast meirvirðisgjald fyri innfluttar vørur og tænastur. Somuleiðis gongur vinningurin inn í virðisgrundarlagið, ið meirvirðisgjald skal roknast av.

Broytingin í føroysku toll- og avgjaldslóggávuni hevur eisini sum endamál at skapa nakrar karmar, sum vinnulívið framyvir skal virka undir. Av tí at føroysk vinna aftaná 1. januar 1993 ikki longur verður vard av einum tollmúri, hevur landsstýrið við hesi lóg lagt dent á at geva føroyskari vinnu somu søtndir, hvat avgjaldi viðvíkur, sum londini rundan um okkum geva teirra vinnulívi.

Tað er útflutningsvinnan, ið kemur at hava størsta fyrimunin av broytingunum.

Fyri tann vanliga brúkaran kemur broytingin í avgjaldsskipanini at merkja, at tænasturnar koma at rinda avgjald. Við broytingini í avgjaldsskipanini koma fleiri at gjalda tað, ið skal í landskassan, soleiðis at avgjaldstrýstið verður spjatt út yvir eitt størri øki.

Harnæst verður insitamentið hjá virkjum at seta prísin niður, t. d. tá ið útsøla er, størri, av tí at meirvirðisgjald verður roknað av søluprísinum.

Av tí at tað altíð er brúkarin, sum í síðsta enda kemur at rinda avgjaldið, verða tað teir brúkarar, ið brúka mest av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, ið koma at rinda mest í avgjaldi.

Soleiðis sum uppskot landsstýrisins er evnað, verður søla av mjólk og øðrum landbúnaðarvørum meirvirðisgjaldsskyldug.

Verða hesar vørur undantiknar meirvirðisgjaldsskylduni, skal innflutningur av hesum vørum eisini verða frítikin fyri meirvirðisgjald.

Landsstýrið heldur tað tí vera rættast at loysa hesar trupulleikar við teimum møguleikum, ið eru sambært EF-sáttmálanum.

Til 2,b skal viðmerkjast, at í samband við nýggju tolllógina vórðu tey so-

kallaðir punktgjøldini, tað eru tey gjøld, ið áðrenn 1. februar 1992 vóru í løgtingslóg um innflutningsgjald, t.d. gjald á rúsdrekka, sigarettum, sjónvørpum og luktilsi, eisini broytt soleiðis, at hesi komu at fylgja uppbýtingini í toll- og vøruskránni. Neyðugt var eisini her at gera eina nýggja lóg, og fekk henda lóg heitið "Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi".

Henda lóg verður eisini galdandi aftaná 1. januar 1993, men neyðugt verður at gera ymsar broytingar í henni. Hetta kemst av, at sambært handilssáttmálanum við EF skal sama avgjald krevjast av vøru, ið er framleidd í Føroyum, sum av vøru, ið verður innflutt til Føroyar.

Verður t.d. avgjørt, at avgjald sambært hesi lóg skal verða á luktilsi, so skal apotekið, um tað framleiðir hesa vøru, umframt meirvirðisgjald eisini rinda avgjald av síni framleiðslu. Tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi innfluttum klædnavørum og føroyskari framleiðslu av sovorðnum vørum.

Landsstýrisins ætlan er tí, at avgjald sambært lóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi í mest møguligan mun bert skal vera á vørum, ið ikki verða framleiddar her á landi, t.d. kann nevnast rúsdrekka, sigarettir, sjónvarp, radio og t.d. ymisk húsarhaldstól. Í tann mun avgjald sambært lógini eisini verður á føroyskari framleiðslu, kemur hetta eisini at skapa fyrisitingarligar trupulleikar. Mett verður tí, at hesi gjøld eiga at verða so fá sum gjørligt, og at inntøkur til landskassan í staðin eiga at koma frá meirvirðisgjaldinum.

Uppskot til broytingar í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi og aðrar lógir, ið neyðugt verður at gera ávísar broytingar í samband við umleggingina, verða løgd fram í ólavsøkutingsetuni.

Tá ið nýggja toll- og avgjaldsskipanin er liðug, fevnir hon um eina løgtingslóg um toll, eina løgtingslóg um meirvirðisgjald og eina løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Haraftrat koma so løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum og løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju.

Orsøkin til, at viðmerkingarnar til hesa lóg eru so umfatandi, er, at lógin í stóran mun gevur landsstýrinum heimild til at seta nærri reglur við kunngerð viðvíkjandi fyrisitingini av lógini.

Roknast má við, at tað skulu gerast einar 15 kunngerðir við heimild í meirvirðisgjaldslógini. Fyri at løgtingið skal kunna seta seg nágreiniliga inn í málið, eru viðmerkingarnar skrivaðar soleiðis, at tær eisini í ávísan mun greiða frá innihaldinum í kunngerðunum.

Ætlanin er eisini, at viðmerkingarnar saman við álitinum hjá løgtinginum, kunnu vera grundarlag fyri einari bók um meirvirðisgjald, soleiðis at fyrisiting, virki og persónar, ið annars koma at arbeiða við hesum rúgvusmikla tilfarinum, hava nakað at halda seg til.

Kanning er gjørd fyri at finna út av, hvussu nógv virkir fara at vera skrásett sambært meirvirðisgjaldslógini, og hvar tey liggja geografiskt, soleiðis at ein fyrisiting, ið skal fyrisita meirvirðisgjaldið, kann verða gjørd.

Henda kanningin er gjørd í samstarvi við Líkningarráð Føroya og er grundað á hesar upplýsingar:


1) Hvussu nógv partafeløg, ið hava goldið løn seinastu 18 mánaðarnar.

2) Hvussu nógv, ið hava fylt út teigarnar hall og vinningur av egnum rakstri í sjálvuppgávuni.

Niðurstøðan er, at tilsamans verða umr. 4.000 virkir skrásett sambært lógini. Afturat hesum skal roknast við, at fleiri lata seg skráseta í samband við útleigu/søtu av húsum. Eisini má roknast við, at nøkur, ið hava sølu, ið er minni enn kr. 20.000, fara at lata seg skráseta.

Býtið av virkjum, ið verða skrásett sambært meirvirðisgjaldslógini, er víst niðanfyri:

	Feløg	Einstakl.	Tilsamans	
Streymoy, Sandoy og Nólsoy	458	1470	1928	
Eysturoy	211	645	856	
Norðoyggjar	106	414	520	
Suðuroy	95	374	469	
Vágoy	60	239	299	
Tilsamans	930	3142	4072	



Fyrisitingin av meirvirðisgjaldinum er fyrst og fremst eftirlit við virkjum. Eftirlitið er fyri ein part roknskapareftirlit og fyri ein part eitt útgjaldingareftirlit. Útgjaldingareftirlitið verður t.d. framt, tá ið eitt virki sendir landskassanum eina rokning orsakað av, at virkið hevur keypt meira av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, enn seft hevur verið fyri í einum avgjaldstíðarskeiði. Hetta eftirlit verður framt á tann hátt, at farið verður út til virkið, har ið skjøl og fakturar verða gjøgnumgingin. Roknskapurin verður ikki gjøgnumgingin, tá ið sovorðið eftirlit verður framt.

Roknskapareftirlitið verður harafturímóti meira nágreinitigt, tí her verður meirvirðisgjaldsroknskapurin grannskoðaður. Orsakað av at livitíðin hjá føroyskum virkjum er sera stutt, verður miðað ímóti, at hetta verður framt í minsta lagi 5. hvørt ár.

Útgjaldingareftirlitið er sostatt tað eftirlit, ið kemur oftast fyri.

Viðvíkjandi sjálvari fyrisitingini metir landsstýrið, at meirvirðisgjaldshøvuðsdeildin eigur at vera í Tórshavn. Henda deildin fær til uppgávu at skráseta virkir, hava eftirlit við inngjaldingum og útgjaldingum, gera roknskapareftirlit, útgjaldingareftirlit og at standa fyri umsitingini av meirvirðisgjaldi annars.

Í minsta lagi ein meirvirðisgjaldskønur eigur at vera á hvørjari tolldeild í landinum. Uppgávan hjá hesum er at fyrisita útgjaldingareftirlitið og at ráðgeva virkjunum í meirvirðisgjaldsspurningum annars. Somuleiðis eigur viðkomandi at hjálpa roknskapareftirlitinum, tá ið eftirlit verður gjørt hjá virki í hansara øki.

Landsstýrið metir, at umframt ein leiðara fyri meirvirðisgjaldsdeildini skulu uml. 7 fólk setast til útgjaldingareftirlitið, meðan 10 fólk skulu setast til roknskapareftirlitið. Av hesum kunnu 4 fólk takast úr teirra núverandi arbeiði á Føroya Tollstovu.

Tey, ið verða sett at arbeiða við meirvirðisgjaldsdeildina, eiga at hava útbúgving innan fyri roknskap.

Viðmerkjast skal, at landsstýrið í løtuni arbeiðir við at kanna, hvussu effektiv og rationel umsitingin av meirvirðisgjaldi kann vera, og um tað er rættast at samskipa umsitingina við aðrar almennar stovnar. Í hesum sambandi er ætlan landsstýrisins at seta ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk, ið skal koma við einum tilmæli hesum viðvíkjandi.

Í samband við meirvirðisgjaldið fær Føroya Gjaldstova, ið skal umsita eftirstøðurnar í hesi skipan, eina nýggja arbeiðsuppgávu. Landsstýrið metir tí, at neyðugt verður at eftirhyggja alla eftirstøðuskipanina hjá landskassanum, hetta fyri at samskipa eftirstøðurnar. Arbeiðið eigur at verða liðugt áðrenn 1. januar 1993.

Sambært fyribils metingum, ið Føroya Gjaldstova hevur gjørt, fer eyka arbeiðsuppgávan, ið meirvirðisgjaldið krevur, og ein miðsavnað eftirstøðuskipan hjá landskassanum á Føroya Gjaldstovu aftur at núverandi arbeiðsorku at krevja 2 fulltíðarstørv. Av hesum er neyðugt at seta ein leiðara, ið skal vera løgfrøðingur.

Viðvíkjandi eftirliti og revsireglunum skal landsstýrið boða frá, at uppskotið er sent fútanum til ummælis.

Har, ið at kalla øll lond í vesturheiminum eru farin frá einari "oms"-skipan til eina meirvirðisgjaldsskipan, er landsstýrisins uppskot at fara beinleiðis frá innflutningsgjaldsskipanini til meirvirðisgjaldið. Meirvirðisgjaldið er á sama hátt sum "oms"-skipanin eitt sølugjald. Munurin á einum innflutningsgjaldi og einum sølugjaldi er, at innflutningsgjald er eitt gjald, ið verður uppkravt, tá ið vørur verða innfluttar, meðan eitt sølugjald er eitt gjald, ið verður uppkravt, tá ið selt verður innan vøru- og tænastumøkið ella innan ein breiðan úrskurð av hesum.

Sølugjald hevur higartil ikki verið nýtt í Føroyum. Framleiðslugjald er tó á øli og mineralvatni. Munurin á framleiðslugjaldi og sølugjaldi er, at framleiðslugjald er eitt gjald, ið verður goldið, tá ið ávísar vørur verða framleiddar, meðan sølugjald verður goldið, tá ið vørurnar verða seldar. Sølugjald kann tí sigast at vera betri fyri gjaldføri hjá virkjum enn framleiðslugjald.

Sølugjald kann annaðhvørt innkrevjast í einum einstøkum søluliði, t.d. framleiðslu-, heilsølu- ella smásøluliði (avgjald í einum liði), ella tað kann innkrevjast í øllum søluliðum (avgjald í fleiri liðum).

Avgjald í einum liði

Um avgjald av hvørji einstakari vøru bert skal innkrevjast eina ferð, áðrenn hon kemur til brúkaran, stinga nógvir spurningar seg upp um, hvussu eitt tílíkt avgjald skal leggjast til rættis.

Soleiðis kundi ein hugsað sær, at avgjald skuldi verið uppkravt av teimum rávørum, ið verða nýttar at framleiða vøruna. Í praksis er hesin møguleikin tó ikki góður, millum annað tí, tað hevði verið sera torført at avgera, hvat heitið "rávøra" fevnir um. Ein vøra, sum í einum sambandi verður rokna sum liðugtvøra, verður ofta nýtt sum rávøra at framleiða aðra vøru (t. d. epli og korn). Haraftrat hevði rávøruavgjald givið rættiliga lítlan vinning í mun til støddina á avgjaldssatsinum, og orsaka av skiftandi rávørubrúki, hevði tað givið eitt sera skiftandi avgjald á lidnar brúkaravørur. At enda hevði tað verið truplult at áseta avgjald á innfluttar liðugvørur.

At leggja avgjald á vørurnar eigur tí ikki at verða gjørt, fyrr enn vørurnar eru lidnar til forbrúk. Á henda hátt slepst undan omanfyri umrøddu trupulleikum.

Sostatt kann talan vera um uppkrevjing í einum av hesum liðum:

a) framleiðslu- ella innflutningsliði
b) heilsøluliði
c) smásøluliði (síðsta liðið)

Avgjaldsálegging í framleiðsluliði førir við sær, at vørur verða avgjaldsavgreiddar, tá ið tær verða seldar frá tí virkinum, ið hevur fingið vøruna lidna til forbrúk. Vørur, lidnar til forbrúk, ið verða innfluttar úr útlondum, mugu tí undir hesi skipan vera avgjaldsavgreiddar, tá ið tær verða innfluttar.

At avgjald verður uppkravt í heilsøluliði merkir, at avgjaldsavgreiðslan vanliga fer fram í næstseinasta søluliði, áðrenn vøran kemur til brúkaran, tað er, tá ið hon verður seld smásøluni.

At enda merkir avgjald í smásøluliði, at avgjaldsavgreiðslan ikki fer fram, fyrr enn vøran verður seld brúkaranum.

Verður avgjald lagt í heilsølu- ella smásøluliðinum, má avgjaldseftirlit ikki bert fremjast á virkjum í viðkomandi liði, men eisini á virkjum í undanfarnu liðum, tí tær vørur, ið avgjald skal leggjast á, prinsipielt verða avgjaldsskyldugar í tí løtu, tær eru liðugt framleiddar. Hetta hevur so við sær, at framleiðandi virki, ið selja vørur sínar, ella ein part av teimum, beinleiðis til brúkarar (t. d. handverkarar), altíð skulu uppkrevja avgjald av hesari sølu og avrokna tað við avgjaldsmyndugleikarnar.

Avgjald í einum liði verður vanliga ikki roknað at vera egnað í relatión til nútímans sølugjald.

Avgjald í fleiri liðum

Avgjald í fleiri liðum kann vera kumulativt avgjald ella meirvirðisavgjald.

Kumulativt avgjald

Kumulativt avgjald er soleiðis, at avgjald í hvørjum einstøkum søluliði skal uppkrevjast av fulla søluprísinum. Avgjald verður sostatt lagt á hvørja einstaka vøru ella tænastu fleiri ferðir á vegnum fram til endaliga brúkaran (tví- ella fleir avgjaldsálegging).

Heilt einfalt merkir kumulativt avgjald, sum sett upp niðanfyri, at avgjald skal rindast av rávøru, tá ið hon verður latin framleiðaranum, at hesin av nýggjum skal seta avgjald á hálvfabrikatið, tá ið tað verður selt framleiðaranum av tí lidnu vøruni, og at avgjald síðani skal áleggjast lidnu vøruni, tá ið hon verður seld frá framleiðara til heilsølu, frá heilsølu til smásølu og at enda frá smásølu til brúkara. Avgjaldið verður við hvørja av hesum sølum roknað við sama avgjaldssatsi, men grundað á prísin við hvørja einstaka sølu.

Fylgjandi konstrueraðu taldømi vísa bygnaðin á kumulativa avgjaldinum (her roknað við einum avgjaldssatsi, ið er 5% av tí prísi, ið verður kravdur í hvørjum einstøkum liði):

	Søluprísur u/avgjald	Avgjald
Rávøruframbleiðsla (t. d. ull)	100 kr.	5 kr.
Hálvfabrikatframleiðsla (tógv)	180 kr.	9 kr.
Liðugvøruframbleiðsla (meturvørur)	260 kr.	13 kr.
Heilsøla	300 kr.	15 kr.
Smásøla	400 kr.	20 kr.

Brúkaraprísur, íroknaður avgjald = 420 kr. Samlaða avgjaldið, goldið av vøruni = 62 kr, sum er umleið 15% av brúkaraprísinum, íroknaður avgjaldið.

Samlaða avgjaldið verður sostatt eftir kumulativu skipanini munandi hægri enn avgjaldið við sølu í síðsta liði (brúkaraprísinum).

Hesin avgjaldsháttur verður av somu orsøk ikki hildin at vera nýtuligur í sambond við nútímans sølugjald.

Meirvirðisavgjald

Meirvirðisavgjald liggur so at siga miðlum avgjald í einum liði og kumulativt avgjald.

Meirvirðisavgjald ber í sær, at avgjald skal roknast av søluprísinum við eina og hvørja sølu eins og við kumulativum avgjaldi, men munurin er, at virki kunnu frádraga avgjaldið, sum tey hava goldið við innkeyp av t.d. rávøru og øðrum útreiðslum til framleiðslu av viðkomandi vøru.

Hvørt einstakt virki skal soleiðis bert inngjalda avgjaldið av tí virðisøkinginini, sum er farin fram í virkinum. Hetta kann vísast við fylgjandi dømi (avgjaldssatsur = 15%):

	Prísur uttan avgjald	Inngangandi avgjald	Útgang. avgjald	Avgjaldstilsvar
	kr.	kr.	kr.	kr.
Rávøruframleiðsla				
keyp	0	0		
søla	80		12	12
Liðugvøruframleiðsla				
keyp	80	12		
søla	200		30	18
Heilsøla				
keyp	200	30		
søla	240		36	6
Smásøla				
keyp	240	36		
søla	320		48	12
Avgjaldsupphæddirnar samanlagdar				48

Fyri eina og hvørja vøru er samanlagda upphæddin av avgjøldum goldin í øllum søluliðum tann sama, sum tað roknaða avgjaldið við seinastu sølu av vøruni (útgangandi avgjald), tað merkir sama upphæddin, sum hevði avgjald í einum liði, í staðin verður uppkravd við sama avgjaldssatsi við seinastu sølu av vøruni.

Fevnir meirvirðisgjald um øll sølulið, herímillum smásølu, kemur avgjaldstrýstið fyri brúkaran solciðis at svara til eitt avgjald í smásøluliði við sama avgjaldssatsi sum meirvirðisgjaldið. Verður smásøluliðið undantikið avgjaldi, svarar avgjaldstrýstið á sama hátt til eitt heilsøluavgjald, og verða bæði heilsølu- og smásøluliðini undantikin, svarar avgjaldið til eitt avgjald í framleiðsluliðinum.

Búskaparliga kemur merivirðisavgjaldið tí at svara til eitt avgjald í einum liði.

Munurin frá avgjuldi í einum liði er millum annað av praktiskum slag, við tað at avgjaldstrýstið við meirvirðisgjaldi verður spjatt yvir eitt størri tal á virkjum. Um avgjaldið fevnir um øll lið, kemur tað at hava tann fyrimun fyri virkini, at avgjald skal roknast við allar søtur, solciðis at seljaranum ikki tørvar at ivast í, um hvør einstøk søla møguliga kann fara fram uttan avgjald.

Ikki kann sigast við vissu, um arbeiðið hjá virkjum og avgjaldsmyndugleikum samanumtikið verður størri ella minni enn undir einum samsvarandi avgjaldi í einum liði, men meirvirðisgjald kann tó føra við sær ein fyrimun viðvíkjandi

eftirlitinum, av tí, at virkini allarhelst hava áhuga fyri at føra nágreinilligan roknskap yvir keyp fyri soleiðis at tryggja sær frádráttarrætt fyri avgjald goldið í undanfarnum søluliðum.

Fyri at skilja meirvirðisgjaldsmeginregluna er umráðandi at hava í huga, at tá ið hvør einstøk vøra verður avgjaldsavgreidd, hevur virkið í praksis ikki møguleika fyri at rokna, hvussu mikið av hesari vørueind, ið er goldið í avgjaldi í undanfarnum søluliðum. Skal virkið hava møguleika fyri hesum, má tað í hvørjum einstøkum føri kanna keypsfakturan gjølla, og tað kann ofta vera torført at finna frá hvørjari vørusending hvør einstøk vørueind stavar. Hvat framleiðsluvirkjum viðvíkur, hevði tað verið eitt trupult rokniarbeiði, ið ikki kann gerast til fulnar.

Tí kann avgjaldsskipanin ikki vera soleiðis løgd til rættis, at frádráttir fyri avgjøld, goldin av hvørjari einstakari vøru ella av hvørjari einstakari vørusending í undanfarnum liði, verða gjørdir í praksis. Í staðin má virkið uppgera avgjaldið av seldum vørum í einum ávísum tíðarskeiði á sama hátt sum við avgjaldi í einum liði, tað er avgjald av fulla søluprísinum, og síðani draga avgjald, goldið av vørum keyptar í sama tíðarskeiði, frá hesari upphædd, hóast tær tá kanska ikki eru seldar.

Sum vansi við meirvirðisgjaldi í mun til samsvarandi avgjald í einum liði kann nevnast, at tað í ein størri mun gevur møguleika fyri einari sonevndari pyramiduavleiðing, tað vil siga, vandin fyri, at seinni søluvið rokna sær vinning av søluavgjaldi, ið er goldið í undanfarnum liðum.

Meirvirðisgjaldsneutralitetur

Meirvirðisgjaldsneutralitetur er eitt, sum lóggevandi myndugleikar í øðrum londum hava lagt stóran dent á, tá umhugsað hevur verið at gjøgnumføra meirvirðisgjaldsskipan. Tað merkir, at avgjald í sjálvum sær ikki ávirkar vinnulívs- og brúkaradispositiónir.

Fyri at avgjald kann sigast at vera neutralt yvir fyri vinnulívsbygnaðinum, má tað krav setast til avgjaldsskipanina, at hon er soleiðis løgd til rættis, at sama avgjald skal rindast uttan mun til, hvussu nógvar handilsliðir ein vøra fer ígjøgnum, at avgjaldið í prosentum av prísinum á eini vøru er tað sama uttan mun til, hvørjum virki keyparin keypir frá, og at avgjaldstrýstið er tað sama uttan mun til, um ein vøra er handverksframleidd ella framleidd við støri ella minni maskinu.

Við øðrum orðum má ikki vera størri fyrimunur fyri keypara at gera síni keyp hjá einum ávísum latara fram um aðrar, og skipanin má ikki mótvirka rationaliseringum innan vinnulívið.

Hvat innflutningi viðvíkur, ber kravið um neutralitet við sær, at avgjaldið av innfluttari vøru skal vera tað sama, sum av vøru, ið er framleidd innanlendis.

Hvat útflutningi viðvíkur, merkir neutralitetskravið, at útfluttar vørur skulu frítakast fullkomiliga fyri avgjald. Tí, við atliti til kappingarførið hjá føroyskum út-

flutningsvirkjum á útlendskum marknaði, er umráðandi, at avgjøld hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis eru áløgd útflutningsvørum.

Í relatión til brúkaravalið merkir neutralitetur, at avgjaldið ikki má bera í sær nakað lyndi at broyta brúkarasamansetingina: tí mugu vørur og tænastur í størst møguligan mun vera avgjaldsskyldugar.

§ 1.

"Sambært hesi lóg skal avgjald rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum."

Til § 1

§ 1 í meirvirðisgjaldslógini er ein innleiðandi grein, ið ásetir at "sambært hesi lóg skal rindast avgjald til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum". Tað eru sostatt tvær treytir, sum eru avgerandi fyri rindan av meirvirðisgjaldi, nevniliga innanlendis søla og innflutningur.

Í meirvirðisgjaldslógini eru ymsir hættir nýttir fyri at tryggja, at meirvirðisgjald ikki ella bert lutvíst verður álagt ávísum tænastum og vørum. Hesir hættir kunnu lýsast soleiðis:

1. Tænastur, ið eru nevndar í § 2, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini eru ikki meirvirðisgjaldsskyldugar. Somuleiðis eisini viðvíkjandi frítøku fyri meirvirðisgjaldsskyldu fyri ávís tiltøk við góðgerandi endamáli, samanber § 2, 5. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Hetta ger, at virki, ið selja tílíkar vørur og tænastur, ikki skulu meirvirðisgjaldsskrásetast. Men harvið fáa virkini heldur ikki møguleika fyri afturrindan av tí meirvirðisgjaldi, ið er rindað, tá ið tilfar og rakstrargøgn v.m. verða keypt. Hesar vørur og tænastur verða sostatt bert fyri ein part frítiknar fyri meirvirðisgjald.

2. Ávís virki - t. d. listafólk, virki, hvørs árliga søla ikki fer upp um kr. 20.000, tanntekmikarar, blind - verða frítikin fyri at gjalda meirvirðisgjald av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, møguliga sambært serligum treytum, samanber §§ 3-4 í meirvirðisgjaldslógini.

Á sama hátt sum undir pkt. 1, skulu viðkomandi virki ikki meirvirðisgjaldsskrásetast, og tær vørur og tænastur, sum virkini selja, verða sostatt bert lutvíst frítikin fyri meirvirðisgjald.

3. Prinsipielt meirvirðisgjaldsskyldugar fatingar kunnu steppa undan meirvirðisgjaldsskyldu, samanber § 12 í meirvirðisgjaldslógini. Hetta er fyrst og

fremst galdandi fyri útflutning av vørum til útlond og tænastur, ið verða gjørdar í samband við útflutning og sølu av skipum og tíðindabløðum, eisini til innanlendis nýtslu.

Hetta hevur við sær, at meirvirðisgjaldsskrásett virki, ið hava frádrátt fyri meirvirðisgjald av keypi, ikki skulu uppkrevja meirvirðisgjald av tílíkari sølu. Sostatt sleppa latingar av umrøddu vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum heilt undan meirvirðisgjaldi.

II. Virki, ið skulu rinda avgjald:

§ 3. Avgjald skal rindast av:

a. Tí, sum rekur sjálvstøðugt vinnuvirki við sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

b. Lutafeløgum og øðrum feløgum, hóast felagið bert selur til limir ella bert selur vørur og tænastur hjá limum.

c. Almennum veitingarvirkjum, sum selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur.

d. Øðrum ríkis-, lands- ella kommunalum stovnum í tann mun, teir selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur í kapping við vinnurekandi virki.

e. Tí, sum skipar fyri uppboðssølum.

2. stk. Í samráð við nevndina, sum er umrødd í § 35, avger landsstýrið, í hvønn mun vinnurekandi virki og feløg skulu rinda avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, tá tær bert verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum ella felagnum, og í hvønn mun kommunur kunnu fáa endurgoldið avgjald sambært hesi lóg av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

3. stk. Latingar av gassi, vatni, ravmagni og hita sum liður í útleigan av húsi ella húsarúmi, hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.

4. stk. Søla av egnum listaverki av tí slagnum, ið hoyrir undir vøruflokk 9701-9703 í toll- og vøruskránni hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.

5. stk. Servering og útleigan av kamari á skúlum og skeiðvirksemi í samband við egna frálæru hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.

Til § 3, 1. stk.

Persónar (likamligir og løgfrøðiligir), ið skulu krevja og rinda avgjald, verða nevndir avgjaldsskyldugir ella skrásetingarskyldugir persónar. Seinna heitið kemur av tí, at hesi hava skyldu at boða tollvaldinum frá til skrásetingar.

Tað er keyp og søla við vinnuligum endamáli frá sjálvstøðugum virkjum v.m., ið førir við sær skyldu at gjalda avgjald. Skylda at lata seg skráseta er eisini galdandi, hóast keyp og søla eru árstíðarbundin ella bert fara fram av og á.

At eitt virki verður vinnuliga rikið merkir, at endamálið við søluni av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum miðar ímóti einum fíggjarligum vinningi, og tað hevur í hesum sambandi ongan týdning um endamálið - at fáa vinning - ikki verður rokkið.

Eitt virkið, ið selur uttan at útflyta, hvørs meirvirðisgjaldsskyldugu útreiðslur eru støðugt størri enn inntøkur av sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, kann ikki metast at verða rikið við vinnuligum endamáli.

Eitt sovorðið virki má roknast sum ítriv og kann tí ikki skrásetast sambært meirvirðisgjaldslógini. Tílíkt virki kann bóast hetta fáa foyvi at vera skrásett framyvir, um útlit eru fyri, at tað kemur at geva yvirskot. Eisini má metast, um skattavaldið metir virkið at verða rikið vinnuligt. At eitt virki (felag) sambært viðtøkum ella líknandi er ætlað at hvíta í sær sjálvum ella at geva undirskot, merkir ikki treytaleyst, at aktiviteturin sambært meirvirðisgjaldslógini skal metast sum ikki vinnuligur.

Eitt virki, ið sambært vanligum roknskaparreglum gevur undirskot, kann, t.d. um útreiðslurnar fyrst og fremst eru ikki meirvirðisgjaldsskyldugar lønir, geva meirvirðisgjaldsyvirskot.

Søla av leysafæ hjá einstaklingi (egnum innbúgvi o.l.) og søla av brúktum innbúgvi og rakstrargøgnum hjá ikki skrásetingarskyldugum virkjum førir ikki við sær skyldu at rinda avgjald. Men selur virkið bert vørur, sum eru móttiknar í umboðssølu ella søluumboði, skal avgjald rindast.

Virki skulu harumframt vera sum sjálvstøðug. Soleiðis skal ikki rindast avgjald av tænastum, sum verða gjørdar av leyst settum hjálparfólki, t.d. handilshjálparfólki, húshjálp, vaskifólki og ørindafólki, ið øll mugu sigast í ein ávísan mun at vera sett í starv hjá tí, sum arbeiðið verður gjørt fyri, og tí mugu roknast sum lønmóttakarar.

Trotabúgv, deyðsbúgv v.m., ið føra skrásett virki víðari, skulu eisini rinda avgjald.

Útlendsk virki, ið reka avgjaldsskyldugt virksemi her á landi (t.d. við entreprenørarbeiði, arbeiði sum útlendskir montørar gera í samband við tænastu ella útleigu av vørum), skulu somuleiðis skrásetast og rinda avgjald.

Til § 3, 2. stk.

Virki, ið ikki selja, men bert framleiða vørur ella gera avgjaldsskyldugar tænastur til egna nýtslu, eru ikki beinleiðis umfevnd av lógini. Landsstýrið kann tó sambært fyriskipanum í § 3, 2. stk. í lógini áseta, at tílík virki skulu rinda avgjald. Tílík avgjaldsskylda kann áleggjast bæði vanligum vinnuvirkjum, felløgum, ríkis-, lands- og kommunalum stovnum.

Hesar reglur eru at nýta í førum, har kappingarorsøkir í serligan mun tala fyri tí, og har tað í ftøkiligum føri kann ávísast, at ikki skrásetingarskyldug virki, fel-

øg, stovnar v. m. tarna søluni hjá skrásettum virkjum vegna meirvirðisgjald, t. d. tí at tey í stóran mun sjálvi framleiða vørur ella gera arbeiði til egna nýtslu.

Landsstýrið kann t. d. í samráð við nevndina í § 35 áseta, at tað almenna ella kommunur skulu rinda avgjald fyri arbeiði, t.d. reingerð og prosjektering, ið verður gjørt av egnari arbeiðsmegi, um hetta virkar kappingaravlagandi fyri onnur skrásett virki.

Vandi kann t.d. vera fyri omanfyri nevndu kappingaravlagingum í byggivinnuni. Byggir ein húsasmiður, ið er meirvirðisgjaldsskrásettur, eitt hús fyri egna rokning og síðani selur tað, skal meirvirðisgjald ikki rindast av hesum, uttan so at henda regla verður sett, av tí at føst ogn ikki verður rokna fyri vøru. Byggir húsasmiðurin eini hús fyri annars rokning, er tað ein tænasta viðvíkjandi fastari ogn, og er hon tí meirvirðisgjaldsskyldug.

Fyri ikki at gera mismun á um húsasmiðurin selur húsini áðrenn ella aftaná, at tey eru bygd, ásetir landsstýrið í kunngerð, at tann (persónur ella virki), sum á egnari grund (fyri egna rokning) ger bygning til sølu ella útleigan, skal rinda avgjald av tí arbeiði við verkætlan og bygging, sum verður gjørt av viðkomandi og hansara starvsfólki, og av tí tilfari, ið nýtt verður til hetta arbeiði.

Tað sama ger seg galdandi, tá ið starvsfólk hjá einum avgjaldsskyldugum virki byggja ella umvæla bygning hjá virkinum. Skylda at gjalda meirvirðisgjald fellur í tí løtu, tá tað er eyðsað, at søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum hjá virkinum fara upp um kr. 50.000 árliga.

Um avgjaldsskylduga virðið annars við bygging fyri egna rokning verður víst til § 8, 3. stk.

Reglan ásetir eisini, at kommunur kunnu táa meirvirðisgjald endurrindað, sum tær í ávísum førum hava goldið fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið eru keyptar frá vinnurekandi.

Hetta ger seg galdandi, tá ið kommunur eins væl kunnu seta fólk til at gera tað arbeiðið, ið annars skuldi verið keypt uttanífrá.Tað kann vera reingerð, arkitektatænastur og tænastur frá ráðgevandi verkfrøðingum.

At ein kommuna av og á keypir vørur og avgjaldsskyldugar tænastur er ikki nóg mikið til at koma undir hesa reglu.

Virki, ið ikki skulu gjalda avgjald.

Til § 3, 3. stk.

Søla av gassi, vatni, ravmagni og hita førir ikki við sær skyldu at rinda avgjald, tá latingin fer fram sum liður í útleigan av húsi ella húsarúmi.

Henda frítøka frá skrásetingarskylduni er grundað á, at útleigan av húsi ella húsarúmi (fastari ogn) vanliga ikki er umfatað av avgjaldsskylduni, tí eru viðkomandi útleigarar ikki skrásetingarskyldugir. Um avgjørt varð, at gass-, vatn-,

ravmagns- og hitaveitingar altíð skuldu verið avgjaldsskyldugar, hevði hetta ført við sær, at næstan allir umrøddir útleigarar kortini høvdu verið skrásetingarskyldugir, við tað at nevndu latingar í flestu førum fylgja við leigumálunum.

Um gass , vatn , ravmagns- og hitaveiting fer fram í samband við útleigan av høli til eitt skráset virki, kann útleigarin tó lata seg skráseta. Lating av gassi, vatni, ravmagni og hitaveiting førir annars altíð við sær skrásetingarskyldu.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 6.

Til § 3, 4. stk.

Søla hjá listafólki av tí slagnum, ið hoyrir undir toll- og vøruskránna vøruflokk nr. 9701-9703, hevur ikki við sær skyldu at gjalda meirvirðisgjald.

Undir hesar vøruflokkar koma t.d. málningar, pastellur og tekningar, ið burturav eru gjørd við hond, "original stik", prent og litografi og upprunaligar (originalar) standmyndir.

Frítøka fyri at rinda meirvirðisgjald kann eisini fevna um sølu av listaverkum á listaframsýning (í hesum sambandi sølufamsýningar hjá listafólkasamtøkum) og frá feløgum fyri listafólk. Hetta er tó treytað av, at sølan fer fram í navninum hjá einstøkum listafólki og fyri rokning hjá viðkomandi, soleiðis at framsýningin ella felagið bert virkar sum umboð (formidler).

Tá ið metast skal, um talan er um umboð, verður dentur eisini lagdur á, um listafólkið hevur fullan ognarrætt til listaverkið, til sølan er framd.

Til § 3, 5. stk.

Útleiga hjá skúlum og skeiðvirksemi av hølum og servering í samband við egna undirvísing hevur ikki við sær skyldu at gjalda meirvirðisgjald.

Frítøka er t.d. galdandi fyri háskúlar, eftirskúlar, fakskúlar og annað skeiðvirksemi, har uppihald við mati verður veitt í tilknýti til egnu undirvísing skúlans.

Reglurnar føra við sær, at t.d. ein háskúli, ið leigar kømur og/ella selur mat til næmingar á skúlanum, ikki skal gjalda meirvirðisgjald av hesum virksemi. Hetta er eisini galdandi, hóast útleigan fer fram í styttri tíðarskeið enn 1 mánað, samanber § 2. 3. stk., punkt b.

Um skúlin leigar út kømur og t.d. selur mat til gestir uttan samband við egna undirvísing annars, skal skúlin rinda meirvirðisgjald sambært vanligu reglunum.

§ 4.

Tann, sum hevur eina árliga søllu av vørum og tænastum, ið er minni enn 20.000 kr., skal ikki rinda avgjald sambært § 3.

2. stk. Landsstýrið kann ásetta reglur, soleiðis at onnur virki verða frítikin fyri at rinda avgjald sambært § 3.

Til § 4, 1. stk.

Eitt virki hevur ikki skyldu at gjalda meirvirðisgjald, um so er, at søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum ikki fer upp um kr. 20.000 árliga, tað merkir prinsipielt innan eitt tilvildarligt 12 mánaða tíðarskeið.

Tá ið søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum verður uppgjørd í relatión til 20.000 kr. markið, skal alt meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi hjá virkinum roknast við til tær 20.000 kr. Tá ið uppgjørt verður, skal kortini ikki hugsast um studning frá tí almenna v. m., uttan so at studningurin er soleiðis vorðin, at hann skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, samanber viðmerkingarnar til § 7.

Til § 4, 2. stk.

Sambært § 4, 2. stk. kann landsstýrið frítaka serligar bólkar av virkjum fyri at rinda meirvirðisgjald.

Orsøkirnar at nýta hesa reglu kunnu vera rættiliga ymiskar í hvørjum einstøkum føri. Sum dømi um hetta kunnu nevnast ymisk kappingarviðurskifti, ikki tilætlað tvískatting, sosial viðurskifti og teknisk eftirlits- og fyrisitingarlig viðurskifti, og tá ið inntøka landskassans í seinast nevnda føri samstundis má metast at verða av lítlum og ongum týdningi.

Reglan er í fyrstu atløgu ætlað t.d. blindum, ið selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, bjargingarfeløgum, bankum og tryggingarfeløgum, ið selja vørur, ið eru afturtiknar orsakað av mislíkahaldi, og tannlæknum og tannteknikarum, ið framleiða úrtøkuligar eftirgjørdar tenn.

§ 5.

Tann, sum sambært §§ 3-4 skal rinda avgjald, skal fráboða virki sítt til skrásetingar hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Hetta er eisini galdandi fyri útlendsk virki. Hevur eitt virki ikki deild ella tílíkt her á landi, skal tað skrásetast við persóni, ið er búsitandi her á landi, ella við virki, sum hevur sølustað her á landi.

2. stk. Hevur viðkomandi fleiri virki, skulu hesi fráboðast til skrásetingar undir einum. Verður roknskapur førdur fyri hvørt virki sær, kunnu virkini kortini eftir áheitan verða skrásett hvørt sær.

3. stk. Skrásetingarskyldug virki, sum ikki hava sama ánara, kunnu eftir áheitan verða skrásett undir einum.

4. stk. Virki, sum verða skrásett undir einum, eru at rokna sum eitt virki.

5. stk. Fráboðan til skrásetingar skal fara fram í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn virksemið byrjar. Broytingar í ánaraviðurskiftum, leiðsluábyrgd ella staði skulu fráboðast áðrenn 8 dagar eftir, at broytingin er farin fram.

6. stk. Skrásett virki fáa útflýggjað prógv um skráseting.

7. stk. Virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, skulu fráboða virki sítt til skrásetingar hjá Toll og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 31. oktober 1992.

Til § 5, 1. stk.

Virki, ið skulu rinda avgjald, í hesum sambandi eisini virki, sum áløgdum er at rinda avgjald, skulu sjálv boða tollvaldinum frá, at tey skulu skrásetast.Virkið fær prógv um skrásetingina.

Í mótsettum føri skulu virki, ið ikki skulu rinda avgjald, ikki boða frá til skrásetingar. Skylda at rinda avgjald og harvið skylda at boða frá til skrásetingar fellur, tá ið tað er eyðsæð, at søla virkisins av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum fer at koma upp um kr. 20.000 um árið, samanber § 4, 1. stk.

Virki, hvørs søla ikki fer upp um kr. 20.000 árliga, eru eins og áður nevnt ikki skrásetingarskyldug, men virki av hesum slag kunnu skrásetast eftir áheitan. Hetta kann hava týdning fyri virki, hvørs latingar bert fara fram til onnur skrásett virki ella til útlutning.

Trotabúgv, deyðsbúgv o.t. eftir skrásett virki skulu skrásetast undir nýggjum tali fyri at avgreiða virkið v.m., ið farið er á húsagang.

Útlendsk virki, ið her á landi reka avgjaldsskyldugt virksemi, og sum ikki hava deild ella tílíkt her á landi, skulu boða frá til skrásetingar við persóni, ið er búsitandi her á landi, ella við virki, ið hevur handilsstað her á landi. Útlendska virkið og umboðið her á landi hava samábyrgd fyri, at avgjald verður rindað.

Noktar skrásetingarskyldugt virki at boða frá til skrásetingar, skipar tollvaldið fyri, at skráseting fer fram (tvingsilsskráseting).

Er spurningurin um eitt virki skal rinda avgjald ivasamur, skal virkið skrásetast.

Eitt sovorðið virki eigur tó at sleppa undan at rinda avgjald, til spurningurin viðvíkjandi avgjaldsskylduni er avgjørdur av nevndini, ið er nevnd í § 35.

Orsakað av, at hvør einstakur fognari ábyrgdast persónligt, solidariskt og beinleiðis fyri skuld hjá fógnarafelagnum, er hvør einstakur fognari skrásetingarskyldugur.

Til § 5, 2. stk.

Hevur tann, ið skal skrásetast, fleiri handilsdeildir, framleiðsludeildir, latingardeildir ella tílíkt, verður skráset undir einum.Verður roknskapur førdur fyri hvørt virki ella hvørja deildina sær, kunnu hesi tó eftir áheitan skrásetast hvørt sær (lutaskráseting).

Til § 5, 3. og 4. stk.

Virki, ið ikki hava sama ánara, kunnu eftir áheitan skrásetast undir einum. Felagsskrásett virki verða í samband við avgjald roknað fyri eitt virki. Felagsskrá-

seting fyrir við sær, at virkini ikki skulu rinda avgjald við sølu sínámillum, og at viðkomandi hava samábyrgd fyri, at avgjaldið verður rindað.

Til § 5, 5. og 6. stk.

Fráboðan til skrásetingar skal fara fram í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn avgjaldsskyldugu virksemið byrjar.

Fráboðan skal undirskrivast av handhava virkisins (e) (einmansvirki, fognarfelag, og lutareiðarí). Fyri partafeløg skal fráboðanin undirskrivast av tí (ti), ið hevur tekningarrættindi, og fyri feløg av formanni leiðslunnar.

Er handhavi ella ábyrgdarbavandi á virkinum ikki myndigur (ikki fyltur 18 ár), skal viðkomandi virki skrásetast við verjanum, og skrásetingarfráboðan skal undirskrivast bæði av aldursómyndinginum og av verjanum.

Broytingar í viðurskiftum hjá skrásettum virki skulu skrivliga fráboðast tollstovuni innan 8 dagar eftir, at broytingin er farin fram.

Hetta er galdandi, um broytingar eru í ábyrgdarhavandi leiðslu (stjóra o.l.), navnabroyting, broyting í bústaði, tali á smásølum, latingardeildum v.m.

Tann, ið heldur uppat at reka skrásetingarskyldugt virki (t.d. við sølu), skal boða frá og siga seg undan skrásetingini. Sama er galdandi, um aðrar broytingar fara fram í eigaraviðurskiftum á einum virki, sum føra við sær broytingar í gjaldsábyrgdini á virkinum.

Prógv um skráseting skal útflýggjast skrásettum virkjum.

§ 6.

Landsstýrið kann áseta reglur um skráseting eftir áheitan frá virkjum, sum selja aðrar tænastur enn tær, ið sambært § 2 eru avgjaldsskyldugar (sjálvboðin skráseting).

2. stk. Virki, ið eru sjálvboðin skrásett, skulu rinda avgjald av sølu av tænastum, sum eru umfevndar av sjálvbodnu skrásetingini.

3. stk. Sjálvboðin skráseting kann í fyrsta lagi halda uppat 2 ár eftir skráseting ina.

Til § 6

Fyri at geva møguleika fyri, at virki, ið selja aðrar tænastur enn tær sambært § 2 avgjaldsskyldugu tænastur, skulu hava møguleika fyri at føra meirvirðisgjald viðari til skrásett virki, er sett ein regla í § 6, har ið landsstýrið kann áseta reglur um, at virki, ið selja aðrar tænastur enn tær, ið sambært § 2 eru skrásetingarskyldugar, kunnu skrásetast eftir áheitan.

Ein slík skráseting verður nevnd sjálvboðin skráseting (má ikki mistakast við skráseting av virkjum, hvørs árliga søla er minni enn kr. 20.000).

Sjálvboðin skráseting førir við sær, at virki sambært vanligu reglunum skulu rinda avgjald av annars avgjaldsfríum tænastum, ið eru umfevndar av sjálvbodnu skrásetingini.

Sjálvboðin skráseting kann hava týðning fyri virki, sum í samband við sølu til skrásett virki ella til útflutning av sínum tænastum nýta fíggjarkrevjandi útgerð.

Virki, ið sjálvboðin lata seg skráseta skulu sum nevnt rinda avgjald, tá ið tey selja tænastur, og skrásettir móttakarar kunnu draga hetta avgjald frá sum inngangandi avgjald. Samstundis kunnu sjálvboðin skrásett virki, draga avgjald, ið er goldið av útgerð v. m., frá sum inngangandi avgjald, tá ið tey avrokna sítt egna avgjald til landskassan.

Av praktiskum orsøkum er ásett, at sjálvboðin skráseting bert kann fara fram fyri eitt tíðarskeið, ið er í minsta lagi 2 ár, roknað frá tí degi, tá ið virkið varð skrásett.

Ætlan landsstýrisins er at áseta reglur, ið loyva sjálvbodna skráseting, tá ið føst ogn verður leigað út til annað endamál enn bústað og umsiting av fastari ogn.

Sambært § 3, 3. stk. skal avgjald ikki rindast fyri lating av gassi, vatni, ravmagni og hita, tá ið hetta verður latið sum liður í útleigan av húsi ella húsarúmi.

Fyri at ein meirvirðisgjaldsskrásettur leigari skal hava frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald, má meirvirðisgjaldsskrásetingin hjá útleigaranum eisini fevna um hesar latingar.

Vinnuskráin

Tá ið byrjað varð at gera nýggja toll- og avgjaldsskipan í september 1990, var beinanvegin greitt, at neyðugt varð at gera eina landsumfatandi edv-loysn viðvíkjandi toll- og avgjaldsskipanini.

Áðrenn hetta hevði Føroya Tollstova bert edv á høvuðsdeildini í Tórshavn.

Tá ið fyrsti partur av tollskipanini varð tikin í nýtslu í februar 1992, var størsti partur av edv-skipanini gjørdur. Tó mangla framvegis nakrar serstakar edv-loysnir, ið væntandi verða lidnar í heyst í ár.

Edv-skipanin, ið er gjørd, fevnir um eina vinnuskrá, har ið allir vinnuligir innflytarar og annars øll, ið verða meirvirðisgjaldsskyldug, skulu skrásetast.

Fyri virki, ið verða skrásett sambært meirvirðisgjalds- og tolllógini, verður skrásetingin harumframt grundarlag undir stýringini av og eftirliti við avrokning hjá virkjunum av avgjaldi, rykkjaraskrivum og tilfari til Føroya Gjaldstovu at nýta til at fáa inn eftirstøður. Toll- og avgjaldsskráin verður harumframt nýtt at adressera "aperiodiskar" sendingar til skrásett virki. At enda er ætlanin at samarbeiði skal vera við Hagstovuna og Føroya Líkningarráð, ið kann fáa/fær allar upplýsingar í Toll- og avgjaldsskránni.

Virki, ið verða skrásett í Toll- og avgjaldsskránni, kunnu býtast upp í privatar juridiskar eindir og almennar eindir.

Privatar juridiskar eindir:

Einmansfyritøkur
Íognarfeløg
Samløguíognarfeløg (kommanditselskaber)
Partsreiðarí
Deyðsbúgv og trotabúgv
Partafeløg
Lutafeløg
Sjálveigandi stovnar
Feløg
Útlendsk virki
Annað, í hesum sambandi feløg við avmarkaðari ábyrgd

Almennar eindir:

Ríkisstovnar
Landsstovnar
Kommunalir stovnar
Fólkakirkjuligt virkni, í hesum sambandi eisini
"Blandaðir" stovnar

Tá ið virki á henda hátt verða býtt upp, er høvuðsdentur lagdur á ábyrgdarviðurskifti. Ábyrgd kann vera knýtt at samlaðari ogn (formue) hjá einum ella fleiri persónum ella vera avmarkað til felagsogn og ísettan pening í feløg v.m.

Í Toll- og avgjaldsskránni verða identitetsupplýsingar um hvørja einstaka skrásetingareind og upplýsingar at nýta til fyrisiting.

Toll- og avgjaldsskráin hevur fylgjandi upplýsingar um hvørt einstakt virki:

Identitetsupplýsingar:

- nummar
- starv og persónsnavn ella virkisnavn
- gøtu- og postbústaður
- telefonnummar
- postgirokontonummar
- P/F-nummar ella

Fyrisitingarligar upplýsingar

Fyrisitingarligar upplýsingar, ið verða nýttar at stýra ymiskar eftirlits- og fyrisitingarligar uppgávur, fevnir m.a. um:

- kommunukotu
- sendingarupplýsingar
  seinast kannaða avgjaldstíðarskeið

- ognarviðurskifti
- upplýsingar um einstøku skrásetingarviðurskiftini, í hesum sambandi kotu fyri:

  lógarøki
  avrokningartíðarskeið
  skrásetingardagfesting
  endadagfesting

- vinnugreinskota
- møguligar ávísingar til onnur toll- og avgjaldsnummør.

III. Avgjaldsskylduga virðið

§ 7.

Við sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum er avgjaldsskylduga virðið. samsýningin, ikki íroknað avgjaldið sambært hesi lóg.

2. stk. Við í avgjaldsskylduga virðið skal roknast:

a. Tey avgjøld sambært øðrum avgjaldslógum. sum eru uppkravd í undanfarnum søluliðum, ella sum skulu rindast í samband við innflutning úr útlondum, ella sum eitt virki hevur skyldu at gjalda í samband við viðkomandi sølu.

b. Tær útreiðslurnar til pakking, sending, trygging og tílíkt, sum eru við í prísinum, ella sum latarin krevur serstakt gjald fyri frá móttakaranum.

c. Íbindingar- og stovningargjald og aðrar upphæddir, sum latarin krevur frá móttakaranum sum treyt fyri, at vørur og avgjaldsskyldugar tænastur kunnu verða latnar.

d. Umboðsløn o. t. og uppboðssøluløn.

e. Kassaavsláttur og annar avsláttur, ið er treytaður av krøvum, sum ikki eru lokin við latingina (fakturaringina).

f. Ískoyti til avgjalding og figging o. t.

3. stk. Rentur, ið vera roknaðar av tí til eina og hvørja tíð skylduga partinum av keypspeninginum, kunnu haldast uttan fyri avgjaldsskylduga virðið, treytað av, at tað er ávíst í keypssáttmálanum ella fylgiskjali viðvíkjandi gjalding, hvussu stórur partur rentan er av hvørjari einstakari gjalding.

Til § 7, 1. stk.

Meirvirðisgjaldsskylduga virðið er avgjaldsgrundarlagið ella tað virðið, ið er grundarlag, tá ið meirvirðisgjald skal roknast av eini lating ella av aðrari veiting, sum førir við sær meirvirðisgjaldsskyldu, t. d. úttøku til handhavans egnu nýtslu av vørum frá goymslu hjá virki.

Tá ið vørur/tænastur verða seldar, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið samsýningin, ikki íroknað meirvirðisgjald.

Tað er uttan týdning, um samsýningin verður veitt sum ein "eingangs"samsýning ella við regluligari rindan.

Móttekur eitt virki rindan fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar í fremmandum valuta til ein avrundaðan kurs, og valuta seinni verður vekslað í peninga stovni til ein hægri kurs, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið tann upphædd, ið verður útgoldin, tá ið vekslað verður til DKK.

Virki, ið móttaka eitt (leysoyra-) veðbræv sum heil ella partvís rindan fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar, skulu rokna áljóðandi virði á veðbrævinum við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, hóast kursurin er undir pari.

Meirvirðisgjaldsskylduga virðið fyri bygging, tá ið byggivirki móttaka privat veðbrøv frá ánaranum sum rindan fult ella partvíst fyri tað, ið bygt er v.m., kann tó ásetast sambært reglum í § 8, 2. stk. (analogt).

Trygd, t.d. bankatrygd og trygging ella ognarveðbrøv, sum latarar krevja frá keyparanum við atliti til, at hesir skulu lúka treytir í samsvari við avtalur, ið gjørdar eru um latingar av vørum/tænastum, ávirka ikki meirvirðisgjaldsskylduga virðið, so leingi sum latararnir ikki fáa inntøku við hesum.

Til § 7, 2. stk. a

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast tey avgjøld í samsvari við aðrar lógir, ið eru uppkravd í undanfarnum søluliði, ella sum skulu rindast í samband við innflutning úr útlondum, ella sum virki skal gjalda í samband við viðkomandi sølu.

Sambært hesum skulu øll (punkt)avgjøld, ið eru goldin í undanfarnum søluliðum, ella sum eitt virki skal rinda í samband við sølu, roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Selur eitt virki vøru fyri eina upphædd, ið er lægri enn tollur, og møgulig (punkt)- gjøld, ið eru goldin við innflutning, er avgjaldsskylduga virðið hesi gjøld. Viðvíkjandi meirvirðisgjaldi við innflutning verður vist til § 27.

Skrásetingargjald, ið verður rindað í samband við sølu av bilum, skal tó ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Hetta stendst av, at hetta avgjald prinsipielt skal rindast av honum, í hvørs navni akfarið verður skrásett (keyparanum).

Til § 7, 2. stk. b

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast tey avgjøld til pakking, sending, trygging o.l., sum eru við í prísinum, ella sum latarin krevur, at móttakarin skal rinda serstakt gjald fyri.

Sambært hesum skulu allar útreiðslur í samband við sølu av vørum/tænastum hjá einum virki prinsipielt roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, undantikið tá ið keyparin fráheldur útreiðslurnar, t.d. við sjálvur at lata pakkitilfar, við at tekna flutningstrygging ella við at skipa fyri flutningi.

Sum dømi um útreiðslur, ið skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, kunnu nevnast:

– brævaporto og pakkaporto, ið skal rindast av keyparanum.

Tað er uttan týdning, um tílíkar útreiðslur viðvíkja avgjaldsfríum tænastum, tá ið tær eru roknaðar við í eina lating av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

– Útreiðslur til ferð, kost og innivist fyri starvsfólk hjá seljaranum. Í ávísum førum kunnu hesar útreiðslur tó haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið (samanber reglur um útreiðslur, sum eru nevndar seinast í viðmerkingunum til § 7).

Til § 7, 2. stk. c

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast fíbindingar- og stovningarútreiðslur og aðrar upphæddir, ið latarin krevur frá móttakaranum sum treyt fyri lating av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Reglan hevur sum mið at tryggja meirvirðisgjaldsjavnstøðu millum virki, ið krevja "eingangs"upphædd við byrjan av regluligum latingum, og virki, ið ikki krevja tílíkar "eingangs"upphæddir, men sum harafturímóti krevja eitt samsvarandi hægri gjald fyri regluligar latingar.

Reglan hevur haraftrat sum endamál at tryggja, at stovningarútreiðslur hjá einum virki ikki verða hildnar uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, tá ið "eingangs"upphædd verður uppkravd frá keyparanum til at gjalda hesar útreiðslur, soleiðis at virkið kann sleppa undan meirvirðisgjaldi.

Uppkrevjing av "eingangs"upphædd, sum treyt fyri latingar av vørum/tænastum, verður serliga nýtt av virkjum, ið veita gass, vatn, ravmagn og hita og av telefonverkinum.

Harumframt verða "eingangs"upphæddir ofta uppkravdar, tá ið bátapláss verður leigað út, og tá ið rakstrargøgn verða leigað út ella leasað.

"Eingangs"upphæddir, ið skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, fevna t.d. um fíbindingar- og stovningaravgjøld, innskot og trygdarfar (deposita). Upphæddirnar skulu roknast við, hóast hesar einans eru fyribils inngoldnar sum trygd fyri ábyrgd keyparans. Verða meirvirðisgjaldsskyldugar upphæddir seinni afturrindaðar, t.d. tá ið leiguumálið endar, kann meirvirðisgjaldsskylduga sølan hjá virkinum tó verða útjavnað.

Í samband við avdrátt fyri útreiðslur til fíbinding og stovning v.m. skulu bæði rentur og avdráttur roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Peningur, ið verður settur í eitt felag í staðin fyri íbindingargjald, skal roknast við í avgjaldsskylduga virðið á latingum til brúkarar í førum, tá ið hetta ikki verður afturrindað, tá ið viðkomandi persónur fer úr felagnum. Verður peningurin afturgoldin, tá ið persónur fer úr felagnum, skal peningurin ikki roknast við í avgjaldsskylduga virðið.

Til § 7, 2. stk. d

Søluútreiðslur sum t.d. umboðsløn (agentprovision) og uppboðssøluløn (auktionssalær), servisu- og reklamuútreiðslur og gjald fyri brúk av patentrættindum skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal roknast umboðsløn (provisión) o. l. og uppboðssøluløn (auktionssalær).

Fyri vørur, seldar á uppboðssølu, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið sostatt boðið + ómaksløn.

Til § 7, 2. stk. e

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast kassaavsláttur og annar avsláttur, sum hava treytir, ið ikki eru loknar við latingina (faktureringina).

Sostatt skal meirvirðisgjald roknast av fulla søluprísinum, uttan at treytaður kassaavsláttur, bonus- og o.t. er drigið frá.

Hóast eitt treytaður avsláttur verður effektivur seinni, kann lækking í meirvirðisgjaldsskylduga virðinum ikki fara fram. Um so er, at avslátturin viðvíkur latingum til meirvirðisgjaldsskyldug virki, kann tó sambært ávísum treytum útjavnast í meirvirðisgjaldsskyldugu søluni (samanber viðmerkingar til § 13, 7. stk.).

Avsláttur, ið er veittur treytaleyst við latingina (faktureringina), skal ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Verður fakturi útflýggjaður, kann avsláttur bert haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, um hann treytaleyst er frádrigin í fakturaupphæddini, áðrenn meirvirðisgjaldið varð roknað.

Fylgjandi dømi lýsa meirvirðisgjaldsviðgerð av avsláttri v.m.:

- Avsláttur vegna gjalding frammanundan. Avsláttur, ið er veittur orsakað av, at viðskiftafólk hava goldið frammanundan undir ymsum sparingarskipanum, skal ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Her er talan um avsláttur, hvørs treytir eru loknar, tá ið vørurnar verða latnar, og meirvirðisgjaldsskylduga virðið kann sostatt ásetast til tann prís, sum viðskiftafólkið rindar fyri vørurnar (samsýningina).
- Avsláttursseðlar. Virðið á avsláttursseðlum, ið virkið sendir út í samband við reklamutiltak, og sum móttakarin kann nýta sum partvís rindan, tá ið hann í smásølu keypir ávísar vørur, ið eru tilskilaðar á seðlinum, kann smásølan ikki halda uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Avsláttursmerki. Virðið á avsláttursmerkjum, sum verða handað keyparum, tá ið vøra verður seld, og sum eru at klistra í avsláttursheftí og verða loyst seinni, skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Til § 7, 2. stk. f

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal roknast ískoyti til kredit, fígging, v. m.

Reglan skal síggjast í samband við § 7, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini, sum ásetir, at vanligar kreditrentur undir ávísum treytum kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Burtursæð frá § 7, 3. stk. er meginreglan, at ískoytið í samband við fígging, sum ein latari krevur frá viðskiftafólki sínum, tá ið vørur/tænastur verða seldar við kreditti, skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Til § 7, 3. stk.

Rentur, ið verða roknaðar av tí til eina og hvørja tíð skylduga partinum av keypsprísinum, kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, treytað av at tað sæst á keypssáttmála ella fylgiskjali viðvíkjandi gjaldingum, hvussu stórur partur rentan er av hvørjari einstakari gjalding.

Sum dømi um at rokna rentu, ið lýkur treytirnar fyri at halda rentuna uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, kann nevnast:

– Kreditsøla, har seldi luturin verður verandi ogn seljarans, til allur keypsprísurin, íroknaður kredittrentur, er goldin (søla við ognarfyrivarni). Kreditrentan verður uppgjørd mánaðarliga (tá ið handilin verður gjørdur, er støddin sostatt ókend) og verður roknað sum ein prosentpartur av ultimosaldo fyri viðkomandi mánaða.

Tað sæst ikki í fylgiskjølunum viðvíkjandi hvørjari einstakari gjalding, hvussu stórur partur av inngoldnu upphæddini er rentur, men virkið sendir hvønn ársfjórðing kontoavrit, har m.a. inngjaldingar, rentur og avdráttur eru tilskilað.

Upphæddir/gjøld, sum eitt virki fær frá viðskiftafólki sum afturrindan av útreiðslum, ið virkið hevur havt í navninum hjá viðskiftafólkinum og fyri rokning hjá viðkomandi, kunnu í ávísum førum haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið fyri tær tænastur, sum virkið hevur gjørt fyri viðskiftafólkið.

Hetta er tó treytað av, at tað ikki snýr seg um útreiðslur, ið sambært vanligum reglum skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið sum vanligar útreiðslur fyri virki, tá ið meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða gjørdar fyri viðskiftafólk.

Treyt fyri at halda hesar útreiðslur uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, er eisini:

at vinningur ikki verður roknaður av teimum.

at serligar útreiðsluuppgerðir kunnu útvegast kundanum viðvíkjandi útreiðslunum (kann útgreinast serstakliga sum útreiðsla í faktura viðvíkjandi meirvirðisgjaldsskyldugum latingum), og

at upprunaligu skjølini viðvíkjandi útreiðslunum verða send viðari til viðskiftafólkið.

Harumfrumt skal kunna greiðast frá útreiðslum og inntøkum viðvíkjandi umrøddu útreiðslum.

Virkið hevur ikki frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av útreiðslum til keyp, ið verða viðgjørd sum útreiðslur fyri viðskiftafólkið.

Fyri virki hava reglurnar sostatt bert veruligan týdning, hvat meirvirðisgjaldi viðvíkur, tá ið tað snýr seg um útreiðslur av keyptum tænastum, ið ikki eru meirvirðisgjaldsskyldugar (t. d. fólkaflutningur), ella útreiðslur, sum virkið ikki hevur rætt at draga frá.

Sum dømi um útreiðslur, ið sambært omanfyri standandi treytum kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, kunnu nevnast:

útreiðslur til metingarmenn og samsýningar til serkøn vitni,
- útreiðslur fyri avgjald til tað almenna fyri at avgreiða mál,
- útreiðslur fyri almennar váttanir/"attestir",
- útreiðslur til tónleik, sum hotell fáa til vega eftir áheitan frá vitjandi, og sum verða afturrindaðar av tí vitjandi. Samsýningar fyri tónleik, sum eitt hotell letur við starvsfólki ella við persónum, ið eru settir av hotellinum, kunnu harafturímóti ikki haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Ráðgevandi virki, t.d. advokatar, arkitektar, verkfrøðingar, grannskoðarar, ráðgevar, kunnu halda ferðaútreiðslur, tað er útreiðslur til ferðir, steðg og mat v.m., uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið treytað av,

at vinningur ikki verður roknaður av hesum útreiðslum,
at ein serlig uppgerð yvir útreiðslur verður útvegað kundanum viðvíkjandi útreiðslunum, og
at upprunaligu fylgiskjølini verða send kundanum.

Tað, sum flutningsfyritøkur gjalda fyri flutning og av- og áskipan í sambond við flutningin, sum aðrar fyritøkur hava fram, kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið sum eitt úttak fyri viðskiftafólkið.

Útreiðslur í samband við sigling við ferju kunnu ikki roknast at vera úttak fyri viðskiftafólkið, men mugu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið fyri flutningin.

Stuðul, ið kann metast at vera samsýning ella ein partur av samsýningini fyri vørur/tænastur, skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Skrásett virki skulu sostatt rinda meirvirðisgjald av studningi, sum kann metast at vera beinleiðis ella óbeinleiðis rindaður fyri vørur/tænastur, sum virkið letur.

Hetta merkir m.a., at meirvirðisgjald vanliga skal rindast av studningi, sum eitt virki fær frá somu persónum, sum fáa vørur/tænastur frá virkinum, og meirvirðisgjald skal rindast av studningi til príslækkan á vørum/tænastum, tá ið hetta beinleiðis ella óbeinleiðis kemur studningsveitaranum til góðar.

Studningur, ið líkist gávum, skal ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, hóast tílíkur studningur kann ávirka prísin á vørum/tænastum, ið verða seldar av skrásettum virkjum. Tað er tó ein treyt, at virkið als einki ger í staðin fyri tann, sum veitir studning, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.

Studningur, ið líkist gávu, er m.a. almennur studningur sum vanligar stuðulsskipanir til vinnuvirki og stovnar, tá ið einki ítøkiligt verður gjørt afturfyri.

Vanliga kann rættur til frádrátt fyri inngangandi meirvirðisgjald, ið stendst av, at virki fáa "meirvirðisgjaldsfrían" studning, ikki avmarkast.

Niðanfyri eru sett upp nøkur dømi, um hvørjar upplæggdir annars skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið:

Tá ið t. d. entreprenørfyritøkur krevja endurgjald frá viðskiftafólkið, sum tær hava avtalu/ sáttmála við um lating av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, og móttakarin er atvoldin til broytingar í avtaluni, sum gera, at endurrindan verður kravd, tá skal endurgjaldið roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, um so er, at endurgjaldið má metast at vera ein partur av samsýningini fyri viðkomandi latingar.

Soleiðis er t. d., tá ið entreprenørfyritøkur krevja endurgjald, av tí at latingin er minkað, við tað at prísásetingin í sáttmálanum kann hava verið fyri eindarprís, ið er roknaður eftir upprunaliga avtalaðu latingini. Minkar latingin, kann vera neyðugt at hækka eindarprísin fyri at fáa føstu útreiðslurnar innaftur. Eitt tílíkt endurgjald, ið skal svara føstu útreiðslunum, má metast at vera ein príshækking (partur av samsýningini).

Haraftrímóti skal meirvirðisgjald ikki rindast av endurgjaldinum (verður ikki mett at vera samsýning), ið einans verður kravt, av tí at givin tilboð um lating av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum eru strikað, t. d. orsakað av at viðkomandi vøra ikki verður fullfíggjað.

Orsakað av at endurgjald, ið tryggingarfeløg veita fyri vørur v.m., ið eru mistar, t. d. orsakað av eldsbruna ella innbroti á virki, ikki er samsýning fyri eina vøru ella avgjaldsskylduga tænastu, skal meirvirðisgjald vanliga ikki rindast av sovorðnum upphæddum.

Gullsmiðir v. m. skulu rinda meirvirðisgjald av fulla søluprísinum, tá ið gullvørur v. m. verða seldar, sum eru framleiddar av egnum gulli (gull keypt ella fingið í býti frá einstaklingum), og sum hoyrir við til vanligu vørugoymsluna hjá

virkinum. Um gullsmiðir gera gullvørur fyri viðskiftafólk, ið sjálvi lata gullið at nýta til framleiðing av einari ávísari vøru, skal virkið bert rokna meirvirðisgjald av tí samsýning, sum viðskiftafólkið skal gjalda fyri framleiðing av viðkomandi vøru, og av samsýning fyri tað gull, ið framleiðarin møguliga leggur afturat.

Tá ið lastbilar við førara verða fluttir við ferju, er avgjaldsskylduga virðið ferðaseðlaprísurin, frádrigin vanligan prís fyri ein persónferðaseðil. Tað skal á ferðaseðlinum prógvast, av hvørjum prísi meirvirðisgjald er roknað.

Tá ið bátapláss verða leigað út, skal meirvirðisgjald rindast av samsýningini fyri hetta. Samsýningin fyri útleigu av "føstum" bátaplássi fevnir - umframt árliga leigu - vanliga eisini um møguligan innskotspening ella depositum, sum verður kravt frá leigarunum sum treyt fyri, at avtala kann verða gjørd um leigu ella sum treyt fyri at fáa yvirræðisrætt (dispositiónsrætt) fyri eitt bátapláss.

Tá ið føst ogn, t. d. hús, verður niðurbrotin, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið ásetast til la samsýning, sum virkið tekur fyri at bróta niður. Virðið á brúkt um tilfari, sum virkið tekur frá niðurbrotna húsinum, skal ikki roknast við í avgjaldsskylduga virðið. Verður brúkta tilfarið møguliga selt, skal meirvirðisgjald gjaldast.

Verður selt til starvsfólk, er søluprísurin meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Er søluprísurin minni enn keyps- ella framleiðsluprísurin, ymisk avgjøld íroknað, skal meirvirðisgjald roknast av keyps- ella framleiðsluprísinum.

Er vanligi søluprísurin hjá virkinum lægri enn keyps- ella framleiðsluprísurin, t. d. tá ið útsøla er, kann meirvirðisgjald tó roknast av hesum.

Stovningargjald skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Fellur stovningargjaldið heilt ella lutvíst burtur, av tí at haldarin í staðin keypir skuldarbrøv ella partabrøv í virkinum, skal meirvirðisgjald rindast grundað á vanliga stovningargjaldið.

Fyri vørur, ið eftir at hava verið leigaðar út við forkeypsrætti, verða seldar leigaranum fyri normalprís, frádrigin fyrr rindaða - og meirvirðisgjaldsavgreidda - leigu ella ein part av hesari, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið restupphæddin (endaligi søluprísurin).

§ 8.

Fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða brúktar av handhavanum av virkinum, er avgjaldsskylduga virðið keypsprísurin ella framleiðsluprísurin, ikki íroknað avgjaldið sambært hesi lóg, javnber tó 3. stk. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða brúktar til endamál, sum ikki viðvíkja sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum hjá virkinum, ella til endamál, sum nevnt í § 16, 3. stk. Við í avgjaldsskylduga virðið skulu roknast avgjøld, sum nevnt í § 7, 2. stk. punkt a. Hevur virkið sjálvt innflutt vørurnar frá útlond-

um, verður eitt samhært reglunum í § 27, 2. stk. ásett virði við møguligum tolli løgdum aftrat, roknað sum keypsprísurin.

2. stk. Fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum heilt ella fyri ein part verða latnar móti aðrari gjalding enn við peningi (býtishandil), er avgjaldsskylduga virðið vanligi prísurin hjá virkinum við sølu av viðkomandi vøru ella tænastu. Er eingin slíkur vanligur søluprísur, er avgjaldsskylduga virðið ein roknaður søluprísur, sum skal fevna um allar útreiðslur og vinning, sum vanliga verða roknað við í avgjaldsskylduga virðið fyri vørur ella tænastur av viðkomandi slagi.

3. stk. Fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum eitt virki nýtir við bygging av fastari ogn til nýtslu hjá handhavanum av virkinum, verður avgjaldsskylduga virðið ásett á tann hátt, sum er nevndur í 2. stk. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum virkið brúkar við bygging av fastari ogn fyri egna rokning, tá ið ognin skal nýtast til endamál, sum ikki viðvíkja keypi og sølu hjá virkinum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, herímillum til sølu ella útleigan, ella til endamál sum nevnt í § 16, 3. stk.

Til § 8, 1. stk.

Í § 8, 1. stk. í meirvirðisgjaldslógini eru ásettar reglur um uppgerð av meirvirðisgjaldsskylduga virðinum í teimum førum, tá meirvirðisgjald skal rindast, tá ið vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða brúktar,

- til handhavarans nýtslu
- til endamál, ið ikki viðkoma sølu virkisins av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ella
- til tey endamál, sum eru nevnd í § 16, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Fyri vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, ið virkið framleiðir ella selur, sum verða tiknar í nýtslu til endamál, ið ikki geva rætt til frádrátt, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið:

- keyps- ella framleiðsluprísurin (frároknað meirvirðisgjald), froknað avgjøld.

Hevur virkið sjálvt innflutt vørurnar úr útlondum, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið tað virðið, ið vøran hevði, tá ið hon varð innflutt, og sum meirvirðisgjald var roknað av, tað merkir: Fakturaprísur, meirvirðisgjald og møgulig punktgjøld, ið eru goldin við innflutning.

Meirvirðisgjaldsskylduga virðið á tí úttikna skal gerast upp og skrivast upp, tá ið tikið verður úr virkinum.

Tá ið tað ikki er møguligt regluliga at skriva tað upp, sum fer til egna nýtslu hjá handhavaranum, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið gerast upp grundað á eina meting yvir brúkið í meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum. Nýtslan kann møguliga gerast upp grundað á eitt mett ársbrúk.

Tá ið tollvaldið metir um tað, sum handhavarin hevur nýtt av vørum v. m. hjá virkinum, er rætt sett upp í meirvirðisgjaldsroknskapinum, skal tann upphædd, sum líkningarráðið hevur sett av til hesa nýtslu leggjast til grundarlag.

Eisini í øðrum førum, har tað ikki er møguligt regluliga at skriva upp tær vørur v. m., ið verða tiknar, t. d. matur til starvsfólkið á matstovum, kunnu tær upphæddir, sum líkningarráðið góðkennir ella vanliga nýtir fyri hesa nýtslu, leggjast til grund, tá ið meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal gerast upp.

Er meirvirðisgjaldsskylduga virðið sambært tí, sum eitt virkið hevur skrivað upp av tiknum vørum v. m. til handhavarans ella starvsfólksins egnu nýtslu, lægri enn tann upphædd, sum líkningarráðið hevur sett av til hesa nýtslu, skal meirvirðisgjaldsskylduga virðið hækkast samsvarandi.

Harumframt gevur § 9, 2. stk. í meirvirðisgjaldslógini møguleika fyri at áseta meirvirðisgjald, tá ið vørur/tænastur verða tiknar grundað á standardvirðið. Nærri reglur fyri hesum verða ásettar við kunngerð um áseting av meirvirðisgjaldi av egnari nýtslu.

Reglurnar verða ásettar fyri at skapa eina ávísa javnstøðu millum virki, ið kunnu taka vørur og tænastur til nevndu endamál frá egnari goymslu ella framleiðslu, og virki og einstaklingar v. fl., ið noyðast at keypa tílíkt aðrastaðni (uttan møguleika fyri at draga tað meirvirðisgjald, ið sostatt verður rindað, frá).

Tá ið rakstrargøgn verða úttikin til endamál, sum ikki gevur rætt til frádrátt av inngangandi meirvirðisgjaldi sambært § 16, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið, tá ið rakstrargøgnini eru undir virðisminkan,

- keyps- ella framleiðsluprísurin, frároknað meirvirðisgjald, lækkaður við 20% fyri hvørt fulla ár, ið er farið síðani keypsdagin.

Fyri rakstrargøgn, ið eru keypt uttan tilfakturerað meirvirðisgjald, skal lækkingin roknast av tí prísi, ið var goldin, tá ið keypt var.

Tá ið meirvirðisgjald verður uppgjørt, skulu útreiðslur av vanligum viðlíkahaldi og umvæling ikki roknast við.

Dømi:

Fingið til vega: 15. juni 1989
Tikið út: 10. apríl 1992

Keypsprísur, meirvirðisgjald ikki íroknað	20.000 kr.
Lækking 40% (2 ár)	8.000 kr.
Meirvirðisgjaldsskyldugt virði	12.000 kr.
Meirvirðisgjald	2.640 kr.

Verður tikið út, eftir at 5 heil ár eru farin síðani tann dagin, tá ið viðkomandi rakstrargøgnini vóru fingin til vega, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið 0 kr.

Tá ið rakstrargøgn, ið ikki eru undir virðisminkan, verða tikin út, kemur lækkingin, sum er 20%, ikki í nýtslu. Hetta merkir, at meirvirðisgjaldið í hesum førum skal roknast grundað á keypsprísin.

Málningar, standmyndir og onnur list og ektað teppi verða mett - um rættur er at draga meirvirðisgjald frá, tá ið keypt verður - sum rakstrargøgn, ið ikki eru undir virðisminkan.

Tá ið motorakfør, sum eru keypt við tilfaktureraðum meirvirðisgjaldi, verða tikin út til endamál, sum ikki gevur rætt til frádrátt, skal meirvirðisgjald roknast av:

- keypsprísinum, frároknað meirvirðisgjald, men íroknað møguligt skráseting-argjald, lækkað við 20% fyri hvørt heilár, ið er farið síðani keypsdagin.

Reglurnar um uppgerð av meirvirðisgjaldsskylduga virðinum, tá ið rakstrargøgn verða tikin út, eru ikki galdandi fyri fløgugøgn, ið eru umfevnd av reglum um regulering av inngangandi meirvirðisgjaldi fyri rakstrargøgn.

Fylgjandi rakstrargøgn verða mett at vera fløgugøgn:

1. Rakstrargøgn, hvørs keypsprísur er størri enn 50.000 kr., ikki íroknaður meirvirðisgjald, og sum eru undir virðisminkan. Keypsprísurin á bilum, ið eru keyptir við tilfaktureraðum meirvirðisgjaldi, er tann upphæddd, sum meirvirðisgjald er roknað av.
2. Rakstrargøgn, hvørs reguleringsskylda - sambært reglunum um regulering av inngangandi meirvirðisgjald fyri fløgugøgn - er tikin yvir, t. d. vegna av hending uttan meirvirðisgjald sambært § 12, 5. stk. í lógini.

Fyri tílík rakstrargøgn (fløgugøgn) er galdandi, at meirvirðisgjald ikki skal rindast sum vanligt, men hvørtfyri mótí skal regulering av frádráttinum ella ein regulering grundað á yvirtikna reguleringsskyldu fara fram.

Nærri reglur um fløgugøgn verða ásettar í kunngerð við heimild í § 16. 2. stk. í lógini. Hetta er eisini umrøtt í viðmerkingunum til regluna.

Til § 8, 2. stk.

Reglurnar um uppgerð av meirvirðisgjaldsskyldugu virðinum á vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ið verða latnar fult ella partvíst móti aðrari gjalding enn peningi (býtishandil), eru nevndar í § 8, 2. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Sambært hesum skal meirvirðisgjald við býtishandil roknast grundað á vanligan søluprís hjá einum virki, tá ið tílík vøra ella tænasta verður seld.

Er eingin vanligur søluprísur, skal meirvirðisgjald roknast grundað á ein mettan søluprís. Hesin prísur skal innihalda keyps- ella framleiðsluprís virkisins, allar útreiðslur og vinning, ið vanliga er við í meirvirðisgjaldsskyldugu virkinum fyri tílíkar vørur ella tænastur, og møgulig avgjøld.

Hesar reglur eru galdandi bæði fyri býtishandil við vørum og meirvirðisgjalds skyldugum tænastum, sum eitt virki selur ella framleiðir, og fyri rakstrargøgn hjá einum virki.

Eru báðir partar í einum býtishandli meirvirðisgjaldsskrásett virki, sum kunnu rokna meirvirðisgjald av tí, tey hava fingið í býti, við í inngangandi meirvirðisgjald, kann meirvirðisgjaldið roknast grundað á munin, javnber viðmerkingarnar til § 17, 4. stk.

§ 8, 2. stk. kann t.d. nýtast, tá ið eitt byggivirki frá ánaramum móttekur skuldarbræv, sum heila ella partvísa gjalding fyri arbeiði. Meirvirðisgjaldið skal í sovorðnum førum roknast av vanliga prísinum hjá byggivirkinum fyri tílíka bygging.

Er eingin sovorðin prísur, skal ein prísur ásetast. Prísurin skal fevna um allar útreiðslur og vinning, ið vanliga verða roknað við í avgjaldsskyldugu virðið fyri tílíkar latingar.

Til § 8, 3. stk.

Tá ið vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða tiknar at nýta til bygging, umbygging ella til at gera nútíðarhóskandi fasta ogn, til handhavara virkisins ella til endamál, sum ikki hava rætt til frádrátt, herímillum til tey endamál, ið eru nevnd í § 16, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini, skal meirvirðisgjaldsskyldugu virðið, sambært § 8, 3. stk. gerast upp sambært somu reglum, sum eru galdandi fyri býtisbandil, samanber § 8, 2. stk. í lógini.

Umvæling og viðlíkahald, hvørs samlaða virðið er hægri enn kr. 50.000 árliga, skal metast javnt við umbyggingararbeiði ella arbeiði at gera nútíðarhóskandi.

Sambært hesum skal meirvirðisgjald roknast grundað á virkisins

— vanliga søluprís fyri eina samsvarandi lating til einstaklingar.

Er eingin vanligur søluprísur, skal meirvirðisgjald roknast av einum nettum søluprísi, ið skal innihalda tær útreiðslur og tann vinning, ið vanliga er við í meirvirðisgjaldsskyldugu virðinum fyri tílíkar vørur og tænastur, tá ið selt verður til einstaklingar.

Verður føst ogn, ið verður bygd fyri egna rokning, og sum meirvirðisgjald skal rindast av sambært § 3, 2. stk., seinni seld, skal meirvirðisgjald ikki rindast av søluni, av tí at søla av fastari ogn er avgjaldsfrí.

Verður ognin seld við tapi, kann virkið hinvegin ikki draga tapið frá í avgjaldsskyldugu søluni.

§ 9.

Eru felags áhugamál millum lataran og móttakaran av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, t.d. soleiðis, at annar er búskaparligt áhugaður í virki ella ogn

hjá hinum partinum, kann landsstýrið krevja, at avgjaldsskylduga virðið skal ásetast á tann hátt, sum er ásettur í § 8, 2. stk.

2. stk. Fyri bólkar av virkjum kann landsstýrið áseta fyridømispeningarnøgd, sum vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið vera nýttar sum nevnt í § 8, 1. stk., kunnu avgjaldsavgreiðast sambært. Í førum, tá ið avgjaldsskylduga virðið verður ásett eftir eini útrokning, kunnu somuleiðis ásetast reglur um avgjaldsavgreiðslu sambært fyridømispeningarnøgd.

Til § 9, 1. stk.

Tá ið vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða seldar millum tvey búskaparliga sambundin virki (felagsáhugamál), er møguleiki fyri, at tann prísur, vøran/tænastan verður seld fyri, ikki er veruligur. Hetta merkir, at tað ikki er sami prísur, sum ein uttanveltaður triði persónur hevði skula goldið, um vøran/tænastan annars varð latin undir somu treytum.

Verða tílíkir serligir prísir nýttir til at minka um meirvirðisgjaldið hjá einum virki, kann reglan í meirvirðisgjaldslógini § 9, 1. stk. takast í nýtslu.

Sambært hesi reglu kann lansstýrið avgera, at meirvirðisgjald skal roknast grundað á eitt virði, ið er uppgjørt sambært reglum fyri býtishandil, javnber § 8, 2. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Reglan eigur bert at verða nýtt, tá ið prísásetingin - orsakað av tí búskaparliga áhugamálinum millum seljara og keypara - ávirkar samlaða meirvirðisgjaldstilsvarið.

Reglan kann hugsast at verða nýtt innan bygging, t. d. tá ið byggivirki byggja fasta ogn fyri feløg, ið byggivirki eigur, og hvørs uppgáva bert er at selja fasta ogn (meirvirðisgjaldsfrí virki), og tá ið byggivirkið við at nýta ein prís, ið er lægri enn tann prísurin, virkið vanliga tekur fyri at byggja fasta ogn, flytur ein part av normalvinninginum til meirvirðisgjaldsfría virkið, og samlaða meirvirðisgjaldstilsvarið fyri byggingina sostatt verður lækkað.

Harumframt kann reglan hugsast at verða nýtt, tá ið samanfall er millum persónar í partafelagi, og tá ið tílík virki millum sín selja fyri undirprísir.

Til § 9, 2. stk.

Ætlan landsstýrisins er at áseta nærri reglur um standardupphæddir sambært § 8, 1. stk. Víst verður til viðmerkingar undir hesi grein.

§ 10.

Við sølu av brúktum persónmotorakførum og av vøru- og lastmotorakførum kann ein sølumaður - tá avgjald ikki er fakturerað sambært hesi lóg við útflýggjan til sølumannin - avgjaldsavgreiða akfarið grundað á eitt avgjaldsskyldugt virði, sum er 83,33% av munum millum keypsprísin og sølusprísin, avgjaldið íroknað. Fer søluprísurin ikki upp um keypsprísin, verður einki avgjald roknað.

2. stk. Fyri virki, ið leiga út motorakfør, og fyri koyriskúlar verður reglan sambært 1. stk. í hesi grein galdandi.

3. stk. Verður avgjaldið roknað sambært grundarlagnum, í 1. ella 2. stk., má hvørki avgjaldsupphæddin ella nakað annað, sum ger tað møguligt at rokna avgjaldsupphæddina, vera nevnt í fakturanum fyri viðkomandi sølu.

4. stk. Sum brúkt akfør eru at rokna akfør, sum, tá ognað verður, eru ella hava verið skrásett her á landi, javnber ferðslulógina.

Til § 10, 1. stk.

Tá ið brúkt persónakfør og vøru- og lastvognar verða seld, hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið ásetast til eina upphædd, sum er 83,33% av munin millum keypsprísin og søluprísin, froknað meirvirðisgjald. Tað er ein treyt, at meirvirðisgjald ikki er tilfakturerað, tá ið akfarið verður latið seljaranum, og tá ið selt verður, má fakturi ikki útflýggjast, ið inniheldur upplýsingar um støddina á meirvirðisgjaldinum, (§ 10, 1. og 3. stk.).

Sum brúkt akfør eru at rokna akfør, ið eru ella hava verið skrásett her á landi sambært ferðslulógini.

Er ein brúktur bilur t.d. keyptur av einum seljara fyri 12.000 kr. og seldur fyri 22.000 kr., er meirvirðisgjaldsskylduga virðið, um meirvirðisgjaldið er 20%, 83,33% av 10.000 kr., sostatt skal meirvirðisgjald rindast við 20% av 8333 kr. Fer søluprísurin ikki upp um keypsprísin, skal meirvirðisgjald ikki rindast. Seljarin kann ikki mótrokna eitt møguligt tap í aðrari meirvirðisgjaldsskyldugari sølu.

Meirvirðisgjaldsreglurnar fyri brúkt akfør skulu síggjast grundað á, at skrásetingargjaldið ikki skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, tá ið nýggj persónmotorakfør v.m. verða seld.

Skrásetingargjaldið er harafturímóti ein partur av virðinum á brúktum akførum, og um so hevði verið, at vanligu reglurnar um avgjald av samsýningini (søluprísinum) skuldu verið galdandi, hevði hetta orsakað av støddini á skrásetingargjaldinum merkt, at meirvirðisgjald serstakliga við sølu av rættiliga nýggjum persónakførum v.m. ofta hevði farið upp um meirvirðisgjald av samsvarandi nýggjum akførum. Hetta kundi ført við sær, at brúkt akfør orsakað av meirvirðisgjaldinum vórðu seld frá brúkara til brúkara og ikki gjøgnum vanligu sølu-liðini.

Til § 10, 2. stk.

Tá ið bilútleigarar og koyriskúlar selja akfør, ið hava verið nýtt til at leiga út ella til meirvirðisgjaldsskylduga koyrilæru, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið ásetast til søluprísin, ikki froknað meirvirðisgjald, lækkaður við nærri ásettum lækkingarprosentum. Hesi prosent verða ásett við kunngerð. Lækkingin kemur at

samsvara við tann partin av virðinum á akfarinum, sum er skrásetingargjald. Verður avgjaldið roknað á hesum grundarlagi, má fakturi ikki útflýggjast, tá ið selt verður, tí inniheldur upplýsing um støddina á meirvirðisgjaldinum (§ 10, 3. stk.).

Orsøkin fyri hesi reglu er tann sama sum fyri akfør, sum seljarar selja. Her er bert valdur ein annar framferðarháttur at taka burtur skrásetingargjaldið frá virðinum á brúktum akførum.

Til § 10, 3. stk.

Verður avgjaldið roknað sambært 1. og 2. stk., má hvørki avgjaldsupphæddin ella nakað annað, ið ger tað møguligt at rokna avgjaldsupphæddina, verða tilskilað á fakturanum.

Orsøkin til hesa reglu er, at keyp sambært § 10, 1. og 2. stk. ikki kunnu heimila keyparanum frádráttarrætt fyri ingangandi avgjald.

Hinvegin skal keyparin ikki rinda meirvirðisgjald, tá ið eitt sovorðið akfar verður selt.

IV. Vavið á avgjaldsskyldugari søla

Til § 11.

Avgjaldsskyldug søla hjá skrásettum virkjum fevnir um latingar móti gjalding og vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum eru framleiddar ella umboðaðar á virkinum, og sum verða tiknar í nýtslu av handhavaranum á virkinum. Harumframt fevnir avgjaldsskyldug søla um vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið vera tiknar í nýtslu til endamál, sum ikki viðvíkja søla av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum hjá virkanum, ella til endamál sum nevnt í § 16, 3. stk.

2. stk. Avgjaldsskyldug søla á ríkis-, lands- ella kommunalum stovnum av tí slagnum, sum er nevnt í § 3, 1. stk., punkt d, fevnir einans um latingar móti gjalding til annan enn viðkomandi ríkis-, lands- ella kommunalan stovn, ella tær kommunur, sum eru partaeigarar í stovninum.

3. stk. Við í avgjaldsskylduga søla skal roknast søla v.m. av vørum, sum virkið hevur móttikið í umboðssøla ella søluumboði.

4. stk. Søla v.m. av maskinum og øðrum rakstrargøgnum hjá virkinum verður roknað við í avgjaldsskylduga søla. Sama er galdandi fyri vørugoymslu, maskinur og onnur rakstrargøgn, tá virkið frámeldar frá skráseting.

Til § 11

Trý heiti verða nýtt at lýsa søluna hjá einum virki í samband við meirvirðisgjaldslógina:

– samlað søla

– søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum
– meirvirðisgjaldsskyldug søla, sum útgangandi ingjald skal roknast av.

Samlaða sølan - ella bert sølan - hjá einum virki er at skilja sum samlaða virðið av latingum av vørum og tænastum, bæði meirvirðisgjaldsskyldugum og meirvirðisgjaldsfrítum, innan eitt ávíst tíðarskeið. Virðið á vørum og tænastum, sum eru tiktar til egna nýtslu, skal eisini roknast við í søluna.

Samlað søla verður einans nýtt at rokna lutvísan frádráttarrætt fyri inngangandi meirvirðisgjald á virkjum við blandaðum rakstri, (javnber, niðanfyri).

Søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum er at skilja sum tann søla, sum meirvirðisgjald skal roknast av, og tann søla, ið sambært § 12 í lógini (útflutningur, umvæling av skipum, flogførum v. m.) kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldugu søluna.

Heitið søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum verður somuleiðis nýtt at rokna partvísan frádráttarrætt á blandaðum virkjum, tað eru virki, ið bæði hava meirvirðisgjaldsskyldugt og meirvirðisgjaldsfrítt virksemi.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla er tann parturin av sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, sum útgangandi meirvirðisgjald skal rindast av.

Hendan søla fæst við at draga sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum frá virðinum av meirvirðisgjaldsskyldugum latingum, sum móttakarin í ávísum førum ikki skal rinda meirvirðisgjald av.

Søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum (§ 11) fevnir um.

a. Allar latingar av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum móti gjaldi. Vørur, sum virkið hevur tikið móti í umboðssølu (kommissión) ella søluumboði (konsignatión), og latingar av vørum, sum virkið letur í umboðssølu ella søluumboði.

Hér talan bert um at umboða (formidla) eina sølu, t. d. tá ið listasøvn selja listaverk í navnunum hjá tí einstaka listamanninum, og tá ið hetta er avtalað millum listamannin og savnið, er talan ikki um umboðssølu, og listasavnið skal bert rinda meirvirðisgjald av samsýningini fyri at umboða (formidla) søluna.

Vørugoymsla, maskinur og onnur rakstrargøgn skulu roknast við í søluna, tá ið effektirnar verða seldar, ella um tey á annan hátt ikki longur verða nýtt í meirvirðisgjaldsskylduga virkinum. Søla í samband við avhending av virkinum til nýggjan handhavara er umrødd undir § 12, 5. stk.

Rakstrargøgn, ið einans hava verið nýtt til avgjaldsfrítt virksemi á virkinum, og tá ið tað av hesi orsøk ikki var frádráttarrættur fyri inngangandi meirvirðisgjald, tá rakstrargøgnini vóru keypt, skulu ikki roknast við.

b. Vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, sum verða framleiddar ella seldar av virkinum og sum verða tiknar í nýtslu

1) av handhavara virkisins (eginnýtsla),
2) til endamál, sum ikki viðvíkur søla virkisins av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum (t. d. í samband við søla av meirvirðisgjaldsfríum tænastum), ella
3) til endamál nevnd í § 16, 3. stk. (naturalløn, matur, umboð, gávur v. m. og útvegan og rakstur av persónakførum).

c. Rakstrargøgn, ið verða nýtt sum nevnt undir b.

Hesar reglur gera, at skrásett virki eisini skulu rinda meirvirðisgjald av teimum av virkinum framleiddu ella seldu vørum og meirvirðisgjaldsskyldugu tænastum, sum verða brúktar til egna nýtslu, t. d. arbeiði hjá handverkara v. m., tá ið hann byggir hús til egna nýtslu ella at leiga út, ella tá ið hann byggir summarhús til starvsfólkið. Henda regla kann bert nýtast á virkjum, ið eisini selja meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur av sama slagi sum tann, ið verður tikin í nýtslu.

Reglurnar skulu eisini síggjast í samband við reglur um rætt til frádrátt fyri inngangandi meirvirðisgjald (§ 16).Virki hava prinsipielt ikki rætt til frádrátt í samband við keyp til egna nýtslu v.m. Men í praksis er ofta so, at eitt virki ikki veit, tá ið keypt verður, um vørurnar skulu nýtast í skrásetta virkinum ella fara til egna nýtslu. Eitt virki má tí ikki rokna útgangandi meirvirðisgjald, tá ið vørurnar seinni verða nýttar til endamál, ið ikki hevur rætt til frádrátt.

§ 12.

Avgjaldsskyldug søla fevnir ikki um:

a. Vørur, sum av virkinum verða útfluttar til útlond, og tænastur, sum vera gjørdar í útlondum.
b. Flutning av vørum her á landi, tá flutningurin fer fram beinleiðis til ella frá útlondum.
c. Arbeiðstænastur á vørur, tá tænastan verður gjørd fyri útlendska rokning, og virkið eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útlond, og konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá framleiðslan av vørunum skal fara fram uttanlands.
d. Prosjekteringsarbeiði v.m. viðvíkjandi bygningum og aðrari fastari ogn uttanlands.
e. Neyðuga útgerð, sum verður latin til nýtslu umborð á flogfari og skipi í uttanlandsferðslu (undantikið sportsflogfør og stuttleikafør), og tænastur, sum verða gjørdar fyri slík flogfør og skip.
f. Søla og útleigan av flogførum og av skipum, sum eru 5 GT og meira, undantikið sportsflogfør og stuttleikafør.
g. Umvælingar-, viðlíkahalds og ísetingararbeiði av fastari útgerð í tey flogfør

og skip, sum eru nevnd í punkt f, og tilfar, sum er latið av viðkomandi virki í hesum sambandi.

h. Søla av tíðindabløðum.

i. Útlendsk tíðarrit í blaðhaldi, tá haldaragjaldið er fingið í lag millum haldaran og útlendska útgevaran.

j. Søla undantikin sølu til heilsølu ella smásølu av fiski og skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni).

2. stk. Landsstýrið kann áseta nærri treytir fyri nýtslu av 1. stk. og gera av, at tænastur, sum verða gjørdar fyri útlendska rokning í øðrum førum, kunnu haldast uttanfyri avgjaldsskylduga sølu.

3. stk. Landsstýrið ásetir reglur um, at bóast ásettu regluna í 2. stk. kann søla, ið er útleigan av kamari til útlendsk ferðafólk, haldast uttanfyri avgjaldsskylduga sølu.

4. stk. Landsstýrið kann áseta, um og í hvønn mun vistir, sum verða latnir skipum ella flogførum til nýtslu umborð ella til sølu til ferðafólk v.m, kunnu haldast uttanfyri avgjaldsskylduga sølu.

5. stk. Við í avgjaldsskylduga sølu skal ikki roknast søla av vørum, sum burturav eru fingnar ella tiknar í nýtslu til tey endamál, sum eru nevnd í § 16, 3. stk.

6. stk. Avhending av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum kann ikki roknast við í avgjaldsskylduga sølu, tá avhendingin fer fram sum liður í eini avhending av virkinum ella einum parti av hesum, og nýggi handhavarin rekur skrásett virki. Virkið skal innan 8 dagar eftir avhendingina geva Toll- og skattstovu Føroya fráboðan um navn og bústað hjá nýggja handhavaranum og um søluprísin á vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum, ið verða avhendað.

7. stk. Landsstýrið ásetir reglur um, at avgjaldsskyldug søla sambært hesi lóg ikki fevnir um sølu av bókum.

Til § 12

Sambært § 12 kunnu ymiskar latingar av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Í samband við hesar latingar er talan um, at ein prinsipielt meirvirðisgjaldsskyldug søla, sleppur undan meirvirðisgjaldi. Frítøkan fer fram á tann hátt, at virkið fær somu fyrimunir sum fyri "meirvirðisgjaldsskylduga sølu", tað er frádrátt fyri meirvirðisgjald av keypi at nýta til tílíka sølu v. m. (t. d. rávørur at nýta til framleiðslu av útflutningsvørum ella pappír at framleiða tíðindabløð).

Meirvirðisgjaldsfrí søla verður skift í tríggjar bólkar:

1. Søla av vørum, sum verða útfluttar til útlond og tænastur, ið verða gjørdar undir viðurskiftum, ið kunnu metast javnt við útflutning.

2. Søla - og fyri ein part útleigan - av nøkrum vørum, sum føkiliga eru nevndar í lógini og av umvælingartænastum o.t. av ávísum av hesum vørum.
3. Søla av vørum, sum virkið hevur tingið til vega ella tikið í nýtslu, einans til endamál, har meirvirðisgjald av keypi ikki kann roknast við í inngangandi avgjald (§ 16, 3. stk.).

§ 12 í lógini inniheldur eisini eina regla um, at avhending av vørugoymsla, maskinum og øðrum rakstrargøgnum lýá einum skrásetnum virki ikki kann (má) roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið avhendingin fer fram sum ein liður í eini avhending av øllum virkinum ella einum parti av hesum, og nýggi handilsaðilin rekur skrásett virki (er ella verður skrásett).

Harumframt kunnu ávísar latingar, t. d. sýnisútlit, reklamulutir og endurgjaldslatingar, haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Ætlanin er at halda útflutning og latingar, ið kunnu metast javnt við útflutning, uttanfyri meirvirðisgjald - uttan mun til um tað snýr seg um vørur ella tænastur.

Hetta er galdandi fyri tær í § 12, 1. stk. punkt a - e, og 2. og 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini nevndu latingar, tað er:

- vørur, sum av virki verða útfluttar til útlond, og tænastur, ið verða gjørdar uttanlands,
- flutningur av vørum her á landi, tá ið flutningurin er beinleiðis til ella frá útlandi,
- arbeiðstænastur á vørur, tá ið tænastan verður gjørd fyri útlendska rokning, og virkið eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útlond, og konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá ið vøran skal framleiðast uttanlands,
- prosjekteringsarbeiði v.m. í sambond við bygningar og aðra fasta ogn uttanlands,
- neyðug útgerð og vistir, ið verður latið at nýta umborð á flogførum og skipum í uttanríkis ferðslu (sportsflogfør og stuttleikafør undantikin), og tænastur, ið verða gjørdar fyri tílík flogfør og skip, og
- aðrar tænastur gjørdar fyri útlendska rokning - sambært fyriskipan landsstýrisins. Tílíkar reglur verða ásettar í kunngerð.

Til § 12, 1. stk. a.

Meirvirðisgjaldsskylduga sølan fevnir ikki um vørur, sum av einum virki verða útfluttar til útlond og tænastur, ið verða gjørdar uttanlands.

Metast javnt við útlond kunnu tær í tolllógini § 8 nevndu søluøkir.

Sum útlond eru at rokna øki utan fyri føroyska tolløkið, tað er øki uttan fyri føroyska landøkið, fjørðir og havleiðina við Føroyar út til 3 sjómil (5556 m) frá grundlinjum og loftrúmið yvir nevnda øki, sum ásett í § 2 í tolllógini.

Virki skulu sum prógv fyri meirvirðisgjaldsfríar latingar av vørum til útlond kunna vísa:

1. Avrit av faktura yvir útflutta vørurnar.
2. Skrivtligan ordra, brævaskifti við keypara, avrokning við banka o. t.
3. Útflytarans útflutningsfráboðan við váttan frá myndugleika, ið hevur eftirlit við útflutningi.

Krøvini um prógvførslu eru galdandi, uttan mun til um vørurnar verða útfluttar við egnum ella frammandum flutningsfari.

Vørur, ið verða fluttar til útlond av keyparanum, t. d. við egnum akfari, kunnu skrásett virki lata uttan meirvirðisgjald. Útflutningsváttanir skulu vísast

Eru omanfyri nevndu treytir ikki loknar, er sølan ikki undanskin meirvirðisgjald.

Til § 12, 1. stk. b.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um flutning av vørum her á landi, tá ið flutningurin fer beinleiðis til ella frá útlandi.

Flutningur av vørum innanlendis kann sostatt av skrásettum virkjum haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið flutningurin fer beinleiðis til ella frá útlandi.

Henda regla hevur til endamáls at sleppa undan møguligum tvíavgjaldi, við tað at møguleiki ikki er fyri meirvirðisgjaldsfrádrátti fyri ein flutning, tá ið flutningurin er rindaður av útlendskum latara.

Sum flutningur av vørum beinleiðis til ella frá útlandi er at skilja flutningur av vørum, ið sambært flutningsavtalu verður gjørdur frá einum staði her á landi til eitt stað í útlandi ella øvugt.

Til § 12, 1. stk. c.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um arbeiðstænastur á vørur, tá ið tænastan verður gjørd fyri útlendska rokning, og virkið eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útland, og konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá ið vøran skal framleiðast í útlandi.

Virki kunnu sostatt halda arbeiðstænastur á vørur uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið virki ger tænastuna fyri útlendska rokning og eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útlond. Prógv fyri at vørurnar eru útfluttar, skal vísast.

Sum útflutningur er somuleiðis at rokna konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá ið vøran skal framleiðast í útlandi. Virkið skal kunna vísa fakturaavrit og aðra váttan sum skrivligar bíleggingar, brævaskifti, avrokning við banka ella tílíkt.

Umvælingar- og umbyggingararbeiði á útlendsk stuttleikafør og vinnuføri sum eru undir 5 GT kann haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, tá ið umvælingararbeiðið v. m. fer fram fyri útlendska rokning, og farið, tá ið umvælingin er liðug, verður flutt aftur til útlandið.

Tó skal tað kunna skjalprógvast, at farið er útflutt.

Umvælingararbeiði v.m, sum er gjørt við persónakfar hjá útlendingi, meðan viðkomandi er staddur her á landi, kann ikki haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldugu søluna.

Til § 12, 1. stk. d.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um prosjekteringsarbeiði v. m. í samband við bygningar og aðra fasta ogn uttanlands.

Prosjekteringsarbeiði og annar tekniskur stuðul í samband við bygningar og aðra fasta ogn uttanlands kann sostatt haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldugu søluna hjá einum virki, uttan mun til um arbeiðið verður rindað av byggifyritøkum, ið hoyra heima her á landi.

Mekling av søluna av fastari ogn, ið er uttanlands, kann eisini haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, uttan mun til um meklingin verður fakturerað til ein keypara her á landi. Sama er galdandi fyri aðrar tænastur í samband við fasta ogn, ið er í útlandi, t. d. advokattænastur.

Til § 12, 1. stk. e.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um neyðuga útgerð, ið verður latin at nýta um borð á flogførum og skipum í uttanríkis ferðslu (undantikið sportsflogfør og stuttleikafør), og tænastur, ið verða gjørdar fyri tílík flogfør ella før.

Latingar av neyðugari útgerð - bæði til installatión og leys útgerð - at nýta umborð á flogfari og skipi í uttanríkis ferðslu, kunnu sostatt haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga søluna.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um tænastur, ið verða gjørdar fyri tílík flogfør og skip. Tænasturnar skulu vera í samband við sjálvt farið, herímillum teirra vanligu útgerð, og tænasturnar skulu verða gjørdar fyri rokning hjá flogfarinum ella skipinum.

Umframt vanligar útflutningsváttanir skal váttan eisini vísast frá skipara ella líknandi um, at latingin er fingin umborð.

Latingar av neyðugari útgerð og tænastur til sportsflogfør og stuttleikafør kunnu ikki haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga søluna, hóast farið fer til útland.

Skipsmeklaratænastur í samband við skip føroysk og útlendsk - í uttanríkissigling kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga søluna, tá ið tænasturnar verða gjørdar fyri rokning hjá skipinum ella einum útlendskum virki.

Søla til útlendsk fiskifør av fsi, brennievni, skipsútbúnaði og skipsútgerð, sum skal roknast við í meirvirðisgjald av keypi her á landi, kann haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Til § 12, 1. stk. f.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um sølu og útleigu av flogførum og skipum, ið eru 5 GT og yvir, sportsflogfør og stuttleikafør undantikin.

Avgjaldsskylda fyri skip og bátar undir 5 GT hevur við sær, at fiskimenn, ið leiga ella keypa sovorðin skip/bátar, kunnu rokna meirvirðisgjald av keypi við í inngangandi avgjaldið.

Vanliga er tað ein treyt fyri meirvirðisgjaldsfría leigu av skipum og flogførum, at útleigan fer fram grundað á ein leigusáttmála ella leiguavtalu, sum partarnir hava gjørt.

Meirvirðisgjald skal rindast av leigu av serútgerð at nýta umborð og av rindan fyri oljunýtslu v. m. og annars av øðrum meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ið verða gjørdar í samband við útleiganina.

Eisini skal meirvirðisgjald rindast av brennievni, ið verður latið í samband við útleigan av skipi og flogfari. Hetta er galdandi, uttan mun til um brúkið av brennievni er íroknað í leigupeningin.

Til § 12, 1. stk. g.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um umvælingar-, viðlíkahalds- og installatiónsarbeiði á teimum í litra f. nevndu flogførum og skipum og teirra føstu útgerð og um tað tilfar, sum viðkomandi virki, í hesum samband hevur latið.

Skipasmiðjur, flogverkstaðið o. t. kunnu sostatt halda umvælingar-, viðlíkahalds-, og installatiónsarbeiði, sum verður gjørt beinleiðis á skip og flogfør og teirra føstu útgerð, uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir bæði um før í uttanlands ferðslu og før í innanlands ferðslu.

Tað, sum skrásett virki (skipasmiðjur, verkstaðir o. t.) lata av tilfari í samband við nevndu arbeiði á før og fasta útgerð, er eisini umfevnt av meirvirðisgjaldsfrítøkuni.

Tilfar, ið verður latið uttan tilknýti til nevnda arbeiði á skip og flogfør og teirra føstu útgerð, kann ikki haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu samkvæmt hesi reglu. Hetta viðvíkur t. d. máling, brennievni, fiskireiðskap og aðra leysa útgerð.

Heitið "og teirra føstu útgerð" er ikki nærri greinað, men má í ein vissan mun metast út frá, um útgerðin er installerað fast (t. d. radioútgerð, radar og onnur navigeringsútgerð, motorar), ella um útgerðin er neyðug orsakað av innrættingini og konstruktiónini v. m. á farinum (bjargingarbátar og annað trygdartilfar).

Útleigan (leasing) av føstum installatiónum (t. d. radar- og deccaútgerð) til før, sum eru 5 GT og yvir, kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldugu sølu útleigarans.

Tænastur, sum skrásett virki ger á skipi, so sum tíðarásett sýn, eftirlit og kanning í serligum førum, t. d. tá ið farið hevur fingið skaða, eru at meta sum umfevnd av reglunum í litra f.

Umvælingartænastur v. m. á skipsbingjur kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, við tað at hesar tænastur verða mettar at vera gjørdar á fasta útgerð á skipinum.

Skipsbingjur eru eindir í einari altjóða skipan við fyrisettum máttum (ISO) við tí ávísa endamáli at vera í staðin fyri vanlig (konventionel) lastrúm á skipi.

Reglan fevnir bert um skipsbingjur, sum hava mát samsvarandi fyrisettum ISO-mátum.

Til § 12, 1. stk. h.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um sølu av tíðindabløðum.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um pening fyri at bera út tíðindabløð.

Tá ið avgerast skal, um eitt blað kann metast at vera tíðindablað, meirvirðisgjaldi viðvíkjandi, verður dentur lagdur á fylgjandi fyritreytir:

1. Um blaðið fyrst og fremst verður lisið vegna tað, ið verður skrivað av áleikandi (aktuellum) tíðindum. Fyri tey bløð, sum ikki kunnu geva nýggjastu tíðindi, av tí tey ikki koma út nóg ofta, er tað eitt treyt, at innihaldið snýr seg um ella viðger evni, ið hava verið áleikandi síðani seinasta útgávu.
2. um blaðið vendir sær til ein hampiliga stóran skara av lesarum.
3. um tað viðger nógv ymisk evni.

Vanlig vikubløð koma sostatt ikki undir hesa reglu.

Harumframt kann dentur - í samband við eina heildarmeting av blaðnum - t. d. leggjast á:

- um tað kann metast at líkjast tíðindablaði tekniskt og typografiskt (pappír, prent, layout osfr.),
- um tað verður selt í leysasølu ella bert til haldarar (felagslimir), og
- hvussu stórt upplagið er,

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um útlendsk tíðindabløð ið fáka treytirnar í hesi grein.

Til § 12, 1. stk. i.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um útlendsk tíðarrit í hendi, tá ið handilin er millum haldaran og útlendska útgevaran.

Føroyskar bóka sølur v. fl. kunnu sostatt lata vera at krevja meirvirðisgjald av haldum millum haldaran og útlendska útgevaran. Útlendsk tíðarrit, ið verða seld í leysasølu, skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskyldaga sølu.

Tá ið avgerast skal, um ein útgáva kann metast sum tíðarrit, meirvirðisgjald viðvíkjandi, er nummarið í toll- og vøruskránni vegleiðandi. Sambært hesum kunnu t. d. handbøkur, orðabøkur, koyriartlanir, vegvísarar og bibliografiir, ið hoyra undir vøruflokk 49.01 (bøkur) í toll- og vøruskránni, ikki metast sum tíðarrit.

Til § 12, 2. stk.

Prinsipielt skal meirvirðisgjald rindast, tá ið meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, ið verða gjørdar her á landi, verða seldar, eisini um keyparin ikki hoyrir heima her á landi.

Sambært § 12 2. stk. verða nærri reglur ásettar, fyri at tænastur, ið verða gjørdar fyri útlendska rokning í øðrum førum enn nevnt í § 12, 1. stk., kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldaga sølu.

Kunngerð um meirvirðisgjald av ávísum tænastum, ið verða seldar til útlond ella keyptar í útlondum, fer at innihalda nærri reglur fyri, undir hvørjum umstøðum ein røð av ítøkiligum tænastum; ið gjørdar verða fyri útlendska roknitg, kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldaga sølu. Hesar reglur verða lýstar niðanfyri.

Fylgjandi tænastur kunnu sambært kunngerð, ið verður gjørd, í ávísum føruan seljast uttan at rokna meirvirðisgjald:

a. Heil ella partvís avhending av upphavsrætti, patentrættindum, licensrættindum, rætti til vørumerki, felagsmerki, mynstur og onnur tílík rættindi.

b. Tænastur í samband við reklamut.

c. Tænastur frá ráðgevandi virkjum, verkfrøðingum, projekteringsvirkjum, advokatum og grannskoðarum og aðrar tílíkar tænastur dátuviðgerð og upplýsing.
Marknaðarkanningar, týðing og ransjótnarvirki koma undir hetta punkt.

d. Tænastur frá vikarstovum.

e. Skyldur til fult ella lutfalsliga at lata vera við at reka vinnuligt virki ella nýta eitt av rættindunum, ið nevnd eru í a-g.

f. Tænastur, ið verða gjørdar av millurmonnum, sum handla í navni og fyri rokning hjá øðrum, um so er, at teirra virki viðvíkur sating av tílíkum tænastum, sum nevndar eru í punkt a-g.

g. Útleigan av leysoyrafæ, burtursæð frá flutningsførum.

Við meting av, um meirvirðisgjald skal rindast av tílíkari sølu, er avgerandi, um tænastan verður brúkt uttanfyri Føroyar.

Sum dømi um tænastur, ið á henda hátt verða mettar sum fult ella lutfalsliga bríktar her á landi, kunnu nevnast: rættarsakir í Føroyum, innheintingar móti føroyskum debitorum, umboðan av arvingum í føroyskum deyðsbúgvi, "responsa" um føroysk rættarviðurskifti og sakkøn hjálp viðvíkjandi keypi ella stovnsetan av virki her á landi.

Tá ið tænastur, ið einans verða nýttar uttanfyri Føroyar, verða seldar, verða fylgjandi reglur galdandi:

Meirvirðisgjald skal altíð roknast,

– um keyparin er eitt meirvirðisgjaldsskrásett virki við handilsstaði her á landi.

Meirvirðisgjald skal ikki roknast,

– um keyparin hevur handilsstað ella bústað uttan fyri Føroyar, ella
– um keyparin er eitt ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki ella einstaklingur við handilsstaði ella bústaði her á landi.

Tá ið flutningsfør verða leigað út (útleigingartænastur), skal meirvirðisgjald altíð roknast, um tænasturnar fult ella lutfalsliga verða nýttar innan føroyskt øki.

Tá ið annað leysafæ enn flutningsfar verður leigað út, og tá ið aðrar tænastur verða seldar enn (punkt a-f), sum fult ella lutfalsliga verða nýttar innan føroyskt øki, eru fylgjandi reglur galdandi:

Meirvirðisgjald skal altíð roknast,

– um keyparin hevur handilsstað ella bústað í Føroyum
  um keyparin hevur handilsstað ella bústað uttanfyri føroyskt øki,

Tá ið niðanfyri nevndu tænastur verða seldar, skal meirvirðisgjald altíð roknast, uttan mun til meirvirðisgjaldsstatus, handilsstað ella bústað keyparans:

a. Tænastur viðvíkjandi fastari ogn, ið er her á landi, herímillum tænastur frá ognarmeklara, ognarseljara v. fl., og tænastur sum prosjektering og ráðgeving.
b. Tiltøk v. m. innan útrótt, undirhald, undirvísing, vísindi v. m., um so er, at tiltøkini eru umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni, og tænastan verður gjørd her á landi.
c. Arbeiði gjørt á leysafæ her á landi.
d. Serkøn metan av leysafæ her á landi, um so er, at metingin er umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni.

Við heimild í § 12, 2. stk. verða eisini settar reglur um frítøku frá meirvirðisgjaldi av vørum, sum verða útfluttar sum ferðagóðs.

Til § 12, 3. stk.

Reglur verða ásettar um frítøku fyri avgjald av provianti, ið verður latin skipum og flogførum. Hetta kemur eisini at galda fyri frítøku fyri toll og avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Latingar av vørum, ið ikki eru umfevndar av toll- og avgjaldsfrfari proviantering, kunnu ikki haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu. Hetta er t. d. galdandi fyri latingar av pípu, tendrara, radio, plátuspælara og ávísum vørum, ið eru ætlaðar at verða seldar í kiosk o. t. í skipi og flogfari í uttanríkis ferðslu.

Til § 12, 5. stk.

Sambært § 12, 5. stk. í hesi lóg, kann avhending av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið avhendingin fer fram sum liður í einari avhending av virkinum ella einum parti av hesum, og nýggi handhavarin rekur skrásett virki.

Virkið skal innan 8 dagar eftir avhendingina boða tollvaldinum frá navni og bústaði hjá nýggja handhavaranum og søluprísi fyri vørugoymslu, maskinur og onnur rakstrargøgn, ið verða avhendað.

Orsøkin fyri regluni er at mótvirka tí áluga, sum meirvirðisgjaldsskrásett virki í ávísum førum kunnu hava at rokna meirvirðisgjald við sølu av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum, við tað at tey á henda hátt kunnu fáa rentufrítt lán frá landskassanum, ið samsvarar við roknað meirvirðisgjald.

Reglan hevur sostatt sum endamál at fyribyrgja órættvísari nýtslu av reglum fyri meirvirðisgjaldsavrokning.

Reglan merkir, at við avhending (søla) av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum hjá einum virki, má meirvirðisgjald ikki roknast, tá ið fakturi ella avrokningarskjal verður latið, um avhendingin fer fram sum liður í einari heilari ella lutfalsligar avhending av einum virki, og nýggi handhavin er ella verður meirvirðisgjaldsskrásettur.

Meirvirðisgjaldsfría avhendingin av rakstrargøgnum v. m. er ikki treytað av, at nýggi handhavin (eigarin) rekur meirvirðisgjaldsskrásett virki innan somu vinnugrein.

Tá ið § 12, 5. stk. skal umsitast, má - út frá einari heildarmeting av nærri umstøðum í samband við avhending virkisins av rakstrargøgnum v. m. - dentur at verða lagdur á, um talan er um vanligar sølu-/keypsumstøður, sum sambært § 11, 4. stk. prinsipielt skulu rinda meirvirðisgjald, ella um handilin líkist heilari ella lutfalsligari avhending av virkinum.

Fyri at tað kann sigast, at talan er um, at eitt virki ella ein partur av tí verður avhendað, er tað ein treyt, at talan er um, at eitt virki ella raksturargøgn v.m. (bú skaparlig eind) verða avhendað við tí fyri eyga, at keyparin annaðhvørt heldur

áfram at reka virkið ella nýtur avhendaðu aktivini á ein sovorðnan hátt, at tað kann metast javnt við rakstur.

Samstundis skal talan vanligə vera um, at seljarin ta løtuna, tá ið avhendað verður, heldur uppat at reka avhendaða virkið ella ein part av hesum.

Við metingina verður dentur sostatt lagdur á, at seljarin heldur uppat at reka avhendaðu búskaparligu eindina, og á ætlan keyparans við at taka yvir búskaparligu eindina.

Hetta merkir, at meirvirðisgjald skal rindast sambært § 11, 4. stk., tá ið eitt virki avhendar t.d. størsta partin av rakstrargøgnum virkisins til ein seljara (bilseljara, maskinseljara, kríatúrseljara v. tl.), sum eftir yvirtøkuna selur rakstrargøgnini til ymisk viðskiftafólk.

Reglurnar í § 12, 5. stk. verða vanliga nýttar í sambond við sølu (ognarskifti) av einum virki ella partí av einum virki, tá ið umframt fasta ogn eisini verður gjørd avtala um, at t. d. hetta fylgir við í avhendingini:

– vørugoymsla, maskinur og onnur rakstrargøgn,
– good-will,
– seljararættindi,
– rættindi at framleiða og onnur immateriel aktiv.

(Selur eitt virki regluliga vørugoymslu, maskinur og onnur rakstrargøgn, selur eitt landbúnaðarvirki t. d. dýr, og sølan fer fram sum natúrligur liður í samband við raksturin av virkinum, skal meirvirðisgjald roknast sambært vanliga galdandi reglum, samanber § 11, 4. stk.)

Vørur, ið eru seldar við gildugum ognarfyrivarni sambært lóg um kreditkeyp, og sum verða tiknar aftur av upprunaliga lataranum sambært gildugt ognarfyrivarni, verða ikki mettar at vera umfevndar av § 12, 5. stk. Sama er galdandi fyri afturtøku av vørum, ið eru latnar í umboðssølu ella søluumboði (kommission ella konsignatión).

Verður meirvirðisgjald av misgávum roknað í samband við avhending av rakstrargøgnum v.m. sum liður í heilari ella lutvísari avhending av virki, skal seljarin (tann, sum stendur fyri roknaðinum) rætta mistakið yvirfyri keyparanum við at geva keyparanum kreditnetu fyri meirvirðisgjaldsupphæddina, samstundis sum hann afturrindar rokna lu meirvirðisgjaldsupphæddina.

Keyparin hevur í hesum førum ikki atgongd til at gera frádrátt í inngangandi meirvirðisgjaldi, javnbert § 15, 3. stk.

Tá ið eitt virki meldar seg frá meirvirðisgjaldsskráseting, heftir virkið (búgvið) fyri meirvirðisgjaldi av møguligum vørum á goymslu, rakstrargøgnum og fastari ogn í samband við steðg/avhending av virkinum.

Í mestum er greitt frá reglum fyri útrokning av meirvirðisgjaldi av vørugoymslu, rakstrargøgnum og fastari ogn, ávikavist, í samband við steðg/avhending av einum virki.

Verður vørugoymslan seld sum liður í avhending (sølu ella uppsiting (bortforpagtning)) av einum virki, má meirvirðisgjald ikki roknast, um so er, at nýggi eigarin er ella verður meirvirðisgjaldsskrásettur.

Í øðrum førum skal meirvirðisgjald roknast av fulla søluprísinum.

Vil verandi handhavi framvegis hava vørugoymsluna sjálvur annað hvørt til egna nýtslu ella til onnur ikki meirvirðisgjaldsskyldug endamál, skal meirvirðisgjald roknast. Meirvirðisgjald skal roknast av keyps- ella framleiðsluprísinum (ikki íroknaður meirvirðisgjald).

Tá ið meirvirðisgjald skal roknast av maskinum og øðrum rakstrargøgnum, má viðjasr fmillum:

1. Rakstrargøgn, sum ikki hava givið virkinum rætt til at frádraga meirvirðisgjald frá keypsprísinum, t. d. persónakfør. Tílík rakstrargøgn skulu ikki rinda meirvirðisgjald, tá ið virkið steðgar v. m.
2. Rakstrargøgn, sum við útvegan kosta yvir 50.000 kr., ikki íroknað meirvirðisgjald, og sum eru undir virðisminkan. Fyri tílík rakstrargøgn, ið verða kallað íløgugøgn, galda serligar reglur, (samanber viðmerkingar til § 16, 2. stk.).
3. Onnur rakstrargøgn hjá virkinum, ið skulu rinda meirvirðisgjald sambært hesum reglum:

Verða rakstrargøgnini seld sum liður í avhending (sølu ella uppsiting (bortforpagtning) av virkinum, má meirvirðisgjald ikki roknast, um nýggi handhavin er ella verður meirvirðisgjaldsskrásettur.

Í øðrum førum skal meirvirðisgjald rindast av fulla søluprísinum.

Vil verandi handhavi framvegis hava vørugoymsluna sjálvur annaðhvørt til egna nýtslu ella til onnur ikki meirvirisgjaldsskyldug endamál, skal meirvirðisgjald roknast.

Meirvirðisgjald skal eisini roknast, um brúksrætturin til rakstrargøgnini í samband við uppsiting (bortforpagtning) av virkinum er farin yvir til uppsitaran, uttan so at verandi handhavin (uppsetarin) er ella verður sjálvboðin meirvirðisgjaldsskrásettur.

Meirvirðisgjald skal roknast grundað á keypsprísin (ikki íroknaður meirvirðisgjald), lækkaður við 20% fyri hvørt heilár, ið er farið síðani keypt varð, javnber viðmerkingarnar til § 8, 1. stk.

Fyri vøruvognar, hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons, sum virkið við útvegan tænði frádráttarrætt fyri, skal meirvirðisgjald roknast grundað á keypsprísin

(froknaður skrásetingargjald, men ikki froknaður meirvirðisgjald) lækkaður við 20%, sum nevnt í viðmerkingum til § 8, 1. stk.

V. Uppgerð av avgjaldsskyldugari sølu

§ 13.

Avgjaldsskyldug søla hjá einum virki í einum avgjaldstíðarskeiði verður uppgjørd sum samlaða avgjaldsskylduga virðið á teimum latingum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum eru farnar fram innan tíðarskeiðið.

2. stk. Fylgir fakturi fyri eina lating, er faktureringin at rokna sum lating, í tann mun fakturering fer fram innan ella skjótast aftaná, at latingin er endað.

3. stk. Fer gjaldingin heilt ella partvís fram, áðrenn latingin er endað, ella áðrenn fakturin verður givin út, skulu 83.33% av upphæddini roknast við í avgjaldsskylduga sølu fyri tað avgjaldstíðarskeiðið, sum gjaldingin er farin fram í.

4. stk. Vørur, sum verða latnar í umboðssølu ella søluumboði, kunnu annaðhvørt verða roknaðar við í avgjaldsskylduga sølu í tí tíðarskeiði, tá ið útflýggjanin fer fram, ella sølu í tí tíðarskeiði, tá ið avrokningin við umboðssølumannin ella søluumboðsmannin fer fram. Í seinast nevnda føri má fakturi sambært § 17 ikki verða givin út, fyrr enn avrokning fer fram.

5. stk. Við uppgerð av avgjaldsskyldugari sølu kunnu verða frádrigin 83,33% av upphæddum, sum eru endurrindaðar viðskiftafólki fyri vørur, sum virki hevur fingið aftur.

6. stk. Við uppgerð av avgjaldsskyldugari sølu kunnu 83,33% verða frádrigin av staðfestum tapi av krøvum viðvíkjandi latnum vørum og avgjaldsskyldugum tænastum. Verða krøvini seinni heilt ella partvís goldin, skulu 83,33% av móttiknu upphæddunum roknast við í avgjaldsskyldugu søluna, uttan so at gjaldingin fæst sambært § 96 í konkurslógini.

7. stk. Við uppgerð av avgjaldsskyldugari sølu kunnu kassaavsláttur og annar avsláttur, sum er treytaður av krøvum, sum ikki eru lokin við latingina, verða drigin frá, um so er, at avsláttarin seinni verður effektivur, og treytað av, at avsláttarin er veittur einum skrásettum virki, sum kann rokna avgjaldið við fyri viðkomandi lating við uppgerð av sínum inngangandi avgjaldi, javnber § 15, 3. stk. Frádrátturin er treytaður av, at kreditnota verður útflýggjað fyri veittan avsláttur, har avgjaldið er tilskilað, javnber § 17, 1. og 2. stk.

8. stk. Vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið verða nýttar av handlavanum á virkinum, verða roknaðar við í avgjaldsskylduga sølu í tí avgjaldstíðarskeiðinum, tá tær eru tiknar í nýtslu. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða nýttar til endamál, sum ikki viðvíkja sølu hjá virkinum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, ella til endamál, sum nevnt í § 16, 3. stk.

Til § 13, 1. og 2. stk.

Í prinsippinum er uppgerðin av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni fyri eitt meirvirðisgjaldstíðarskeið knýtt at teimum latingum av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, sum eru farnar fram í tíðarskeiðinum.

Nær, ið latið verður, er avgerandi fyri, nær ið latingin skal roknast við til avgjaldsskyldugu søluna mótsett gjaldingini.

Verður fakturi útflýggjaður yvir eina lating, verður dagurin, tá ið fakturerað verður, mettur sum dagurin, tá ið latið verður, um so er at faktureringin fer fram, áðrenn ella skjótast aftaná, at latingin er endað.

Sama er galdandi, um móttakarin útflýggjar avrokningarskjal í samband við latingina, og avrokningarskjalið verður útflýggjað, áðrenn ella skjótast aftanat latingin er endað.

Reglan um, at dagurin, tá ið fakturi verður útflýggjaður, kann metast sum dagurin, tá ið lating fer fram, er við, tí í praksis er tað í mongum førum torført at siga, akkurát nær latið varð.

Orðingin "skjótast aftaná at latingin er endað" er ikki nærri lýst í lógini, men útflýggjan av faktura og avrokningarskjali má ikki fara fram seinni enn tað, sum vanligt er innan viðkomandi vinnugrein.

Steðgar eitt skrásett virki sínum gjaldingum, og búgvið verður skrásett fyri at halda fram ella avtikið, skulu latingar fram til dagin, tá ið virkið steðgaði gjaldingini, bókast í meirvirðisgjaldsroknskapin hjá virkinum.

Upphæddir, ið verða kravdar frá keyparanum, skal seljarin rokna við í avgjaldsskyldugu søluna, uttan mun til um spurningurin um gjalding endar sum rættarsak millum seljara og keypara.

Virki, sum í einum senda út fleiri giroinngjaldingarkort at gjalda í pørtum, sum í útsjónd og innihaldi eru fakturar, skulu rokna alla ta upphædd, sum er uppkravd í hesum tíðarskeiði, við í meirvirðisgjaldsskylduga søla í tí tíðarskeiði, tá ið giroinngjaldingarkortini verða send út.

Sama er galdandi fyri virki, sum á hendan hátt regluliga senda út uppkrevjingar møguliga saman við einari serstakari uppgerð.

Um so er, at tann parturin á giroyðiblaðnum, sum er kvittan, ella uppgerðin, ið send er, innihalda upplýsingar um, at meirvirðisgjald av hvørjum einstøkum gjaldi ikki kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá móttakaranum, fyrr enn rokningin fellur til gjaldingar, seinasta gjaldingardag ella aðra ásetta tíð, kann virkið kortini fáa loyvi til at bíða til hendan ásetta dag við at rokna gjaldið við í meirvirðisgjaldsskylduga søla, í staðin fyri tá ið uppgerðin ella giroinngjaldingarkortini verða send móttakaranum.

Til § 13, 3. stk.

Verður goldið fult út ella partvíst, áðrenn lating ella fakturi verða útflýggjað, skulu gjøld (ikki íroknað meirvirðisgjald) roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu í tí tíðarskeiðinum, tá tey eru móttikin.

Tá ið goldið verður fult út ella partvíst fyri vørur og tænastur

– áðrenn vøra/tænasta er latin,
– áðrenn latingin er endað, ella
– áðrenn fakturi er útflýggjaður,

skulu gjøldini sostatt altíð roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, tá ið vørurnar verða móttiknar. Hetta er eisini galdandi fyri akonto gjaldingar, ið fara fram, áðrenn latingin endaliga er farin fram.

Smásølur, sum avrokna við viðskiftafólkið hvørja viku, kunnu kortini rokna latingarnar við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, tá ið goldið verður.

Verður akonto áheitan, sum í útsjónd og innihaldi líkist faktura, útflýggjað, áðrenn goldið er, verður dagfestingin á akonto áheitanini mett sum daguriu, tá ið latið verður.

Reglurnar um gjalding frammanundan v. m. hava sum endamál at sleppa undan, at fakturering verður seinkað/drigin út.

Um ein keypari góðtekur ein veksil uppá gjalding frammanundan ella akonto gjalding, verður gjaldingin mett at fara fram, tá ið keyparin kontant innloysir veksilin.

"Diskonteraðir" vekslar verða vanliga innloystir, tá teir falla til gjaldingar, um so er, at seljarin ikki áðrenn 6 dagar eftir hetta hevur fingið fráboðan frá veksilhandhavanum (bankanum) um, at veksilin er mótmæltur.

Til 13, 4. stk.

Vørur, sum verða latnar í søluumboði ella umboðssølu, verða tiknar við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum, sum vørurnar verða latnar frá, ella í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum, tá ið avroknað verður við móttakaran (kommissionerin ella konsignatarin).

Í seinni nevnda dømi má fakturi ikki útflýggjast, fyrrenn avroknað verður. Verður fylgiblað ella annað fylgiskjal útflýggjað, tá ið vørurnar verða latnar, skal tað gerast greitt, at fylgiskjalið ikki er ein fakturi.

Sostatt kunnu virki innan kommissións- og konsignatiónshandil velja, nær ið tey skulu rokna vørurnar til avgjaldsskyldugu søluna.

Vørur, ið verða latnar í úrvali ella til royndar, kunnu roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna sambært somu reglum, sum eru ásettar fyri kommissións- og konsignatiónsvørur.

Søla v. m. av vørum, sum eitt virki hevur fingið í kommissión ella konsignatión, verða roknað við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna sambært vanliga galdandi reglum.

Til § 13, 5. stk.

Tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla skal gerast upp, kunnu returvørur dragast frá søluni eftir nærri ásettum treytum.

Orsøkin til hesar reglur er, at meirvirðisgjaldsskylduga sølan verður uppgjørd eftir prinsippinum fyri latingar.

Regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu skal, tá ið talan er um returvørur, fara fram við samsýnta peninginum (ikki íroknaður meirvirðisgjald).

Fyri at rokna hesa upphædd má ein vita, nær latingin er farin fram fyri at fáa ásett/sligið fast, hvønn meirvirðisgjaldssats virkið hevur nýtt, við tað at reguleringin altíð skal fara fram grundað á meirvirðisgjaldssatsin, sum var galdandi, tá ið latið varð.

Um meirvirðisgjald av returvørum verður roknað við 20%, kann tann peningurin, ið skal nýtast at regulera meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, roknast sum 83.33% av tí upphæddini, sum verður endurgoldin viðskiftafólkinum.

Reglan viðvíkur vørum, ið verða tiknar aftur av upprunaliga seljaranum undir sovorðnum umstøðum, at handilin er ella verður annulleraður, tað er, í teimum førum har viðskiftafólki fær fullan søluprís afturfyri vøruna.

Reglan skal eisini geva møguleika fyri meirvirðisgjaldsregulering, um lutvís samsýning fæst fyri vørur, sum verða sendar aftur, innan garantifreist ella verða sendar/keyptar aftur innan 1 ár eftir, at handilin er farin fram.

Harumframt er eisini møguleiki fyri meirvirðisgjaldsregulering av vørum, sum eru seldar til avgjaldingar við ognarfyrivarni ella við serligum keypssáttmála (uttan ognarfyrivarni), og sum verða tiknar aftur, av tí at keyparin ikki hevur lokið treytirnar (nitsrøkt av keypssáttmála).

Reglan um returvørur eigur at verða brúkt, soleiðis at fyrivarni verður tikið við handilsbrúki innan vinnulívið, fyrisiting og eftirlit.

Keypir t. d. keyparin eina nýggja vøru fyri ein lægri prís enn annars, orsakað av at gamla vøran verður latin seljaranum, kann reglan í 5. stk. ikki brúkast.

Prísavsláttur, sum verður veittur viðskiftafólki fyri vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, ið meirvirðisgjald áður er goldið fyri, kann dragast frá í avgjaldsskyldugu søluni við samsýningini (ikki íroknað meirvirðisgjald).

Prísavsláttur skal dragast frá í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiði, tá ið grundarlagið fyri regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu verður staðfest.

Meirviriðisgjaldsskyldug avgjaldingaríkoyti, fíggjaríkoyti, rentuíkoyti o. l., ið verður roknað, tá ið avgjaldingarsáttmálar verða gjørdir, kann dragast frá (ikki íroknað meirvirðisgjald) í tann mun, tað verður samsýnt keyparanum. Hetta er

t.d. galdandi, um ein avgjaldingarsáttmáli verður innloystur, fyrr enn ásett var, tá ið hann varð gjørdur.

Til § 13, 6. stk.

Tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla verður uppgjørd, verður tað møguligt sambært niðanfyri standandi reglum, at gera frádrátt í meirvirðisgjaldsskyldugu søluni fyri staðfest tap uppá skuldarar viðvíkjandi latnum vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

1. Eitt tap kann sigast at vera staðfest í hesum føruni:

a. Tá ið trotabúgv, virki í avtøku (likvidatiónsbúgv) ella deyðsbúgv verður endaliga uppgjørt, og tað verður skjalprógvað, at full rindan ikki er fingin fyri fráboðað krøv.

b. Tá ið talan er um neyðskuldarsemju, tvingsils- og avtøkusemju (likvidationsakkord), og áogn/útistandandi ogn verður niðurskrivað í virði við einum ávísum parti av kravinum.

Tílíkar skuldsemjur eru nærri lýstar í konkurslógini § 137, pkt. 1 og 2.

Henda regla fevnir harafturímóti ikki um § 157, pkt. 3 í konkurslógini, ið viðvíkur gjaldsútseting (skuldargrið).

c. Tá ið kreditorar taka undir við einari sjálvbodnari skuldsemju, ið førir við sær ein niðurskurð av krøvum frá kreditorum móti skuldara, og orsøkin til at kreditorarnir taka undir við skuldsemjuni hevur sum endamál, at meginparturin av krøvunum verður rindaður.

Tá ið mett verður um hetta, eigur dentur at verða lagdur á:

- at uppskot til skuldsemju er sett fram av advokati/vinnugreinsfelagi,
- at framlagda roknskapartilfarið- aktuell statusuppgerð v. m. - er gjørt av statsautorisera um ella skrásettum grannskoðara,
- at í minsta lagi helvtin av kreditorunum (peningaliga roknað) hava tikið undir við skuldsemjuni,
- at býtispeningurin á skuldsemjuni í minsta lagi er líka stórur, sum roknaði hýtispeningurin hevði verið, um talan varð um konkurs,
- at skuldsemjan samanumtikið tømir ogn (+ peningaogn) skuldarans, og
- at kreditor ikki stendur skuldaranum nær, javnber § 2 í konkurslógini.

Rímiliga góð prógv skulu kunna vísast fyri omanfyri nevndu krøvum, og býtispeningur á skuldsemjuni skal t. d. kunna prógvast við serligari váttan frá advokati/ vinnugreinsfelagi.

Sjálvboðin skuldsemja (akkord) er ein avtala millum skuldara og kreditorar, sum ber við sær, at kreditorarnir geva ein part av áogn/útistandandi peninginum eftir.

Sjálvboðið fíggjartrot (likvidatión) er harafturímóti ikki ein sjálvboðin skuldsemja, við tað at skuldarin ikki sleppur undan tí partinum av skuldini, sum ikki verður rindaður við trotapeninginum. Tap, ið komast av sjálvbodnum fíggjartroti, eru umfevnd av reglunum í pkt. f.

Tá ið avgerðast skal, um eitt tap kann metast at vera staðfest, má ein heildarmeting gerast at vita, um kreditor tekur undir við skuldsemjuni fyri at fáa mest møguligt av kravinum rindað.

Við hesa heildarmeting verður dentur lagdur á omanfyri lýstu umstøður (t. d. at uppskot til skuldsemju er sett fram av advokati/virmugreinsfelagi), men tað verður ikki kravt, at sjálvbodna skuldsemjan samsvarar neyvt við tær í regluni nevndu umstøður.

Við heildarmeting kann dentur harumframt leggjast á, um skattavaldið hevur góðtikið, at tapið kann dragast frá í inntøkuuppgerðini.

d. Tá ið útskrift av fútaprotokollini vísir, at einki er komið burtur úr fútarættarviðgerð fyri viðkomandi krav, ella tá ið rað út frá fútaprotokollini kann prógvast, at ein annar kreditorur innan í mesta lagi 6 mánaðir hevur framt úttøku hjá viðkomandi debitori uttan at kunna fáa fult rind fyri sína áogn/útistandandi pening.

e. Tá ið løst ogn, tað er bæði bústaður og vinnuvirki hjá einum virki, ið verður rikið av einstaklingi, er seld á tvingsilssølu, uttan at kreditor av hesum fær rind fyri áogn/útistandandi pening. Tað er ein treyt, at kreditorurin við roknskapartilfari v. m. viðvíkjandi debitorinum kann prógva, at kravið er endaliga mist.

f. Annars tá ið metast kann, at nóg mikið er gjørt fyri at fáa krøvini rindað. Tá ið metast skal um hetta, má hugsast um støddina á kravinum. Tað er vanliga ein fyritreyt fyri at kunna gera frádrátt, at handilssambandið við viðkomandi debitor er steðgað í minsta lagi eitt ár, áðrenn frádráttur verður gjørdur.

Reglan er serstakliga ætlað smærri krøvum, sum hava útreiðslur í samband við møguliga innheinting, ið eru órímiliga stórar samanborið við virðið á kravinum.

Tala umstøðurnar fyri tí, kunnu frávik gerast frá regluni um, at góðkenning av frádrátti er treytað av, um handilssambandið við viðkomandi debitor er steðgað í minsta lagi 1 ár, áðrenn frádráttur verður gjørdur.

Reglan kann eisini nýtast í førum, har tap kemst av sjálvbodnari avtøku (likvidatión).

2. Tað er í øllum førum ein fyritreyt fyri at gera frádrátt, at tað sæst í roknskapartilfarinum v.m., hvussu er við útistandandi krøvum, og at roknskapurin

annars verður førdur soleiðis, at tað verður tryggjað, at frádrigin peningur verður tikin við í avgjaldsskyldugu søluna.

3. Sum meginregla kann frádráttur ikki gerast fyri væntað tap av debitori.

Væntað tap av krøvum í trotabúgvi og deyðsbúgvi (skuldfrágongubúgvi) kann tó frádragast fyribils, áðrenn búgvið er endaliga viðgjørt. Tað er ein treyt, at virkið hevur eina váttan frá bústjóranum um, at býtispeningurin (dividendan) ikki kann væntast at fara upp um ein nærri ásettan prosentpart av kravinum.

Fyribils frádráttur fyri væntað tap kann eisini gerast, tá ið skuldarin hevur boðað frá gjaldssteðgi.

Tað er ein treyt, at váttan er fingin frá einum av skiftirættinum settum eftirliti, um at tað má væntast, at kreditorar við ongum framíhjárætti bert fáa rind fyri ein nærri ásettan prosentpart av tí teir hava til góðar við tí hollastu av teimum kreditskipanum, ið arbeitt verður við.

Tað er harumframt ein treyt, at rokning av "dekningsprosentinum" byggir á eina ajourførda statusuppgerð fyri skuldaran, ið eftir áheitan skal sendast tollvaldinum.

Frádráttur kann gerast við tí staðfesta tapinum, ikki íroknað avgjald. Um so er, at kravið seinni verður goldið fult ella partvíst, skal fingni peningurin (ikki íroknaður avgjald) roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna.

Fyri at rokna hesa upphædd má vitast, nær latið hevur verið, fyri at fáa sligið fast, hvønn meirvirðisgjaldssats virkið hevur nýtt.

Er meirvirðisgjald av returvørum toknað við 20%, kann tann upphædd, ið skal nýtast við regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu roknast sum 83,33% av tí upphædd, sum verður samsýnd kundanum.

Til § 13, 7. stk.

Samhært § 13, 7. stk. kann frádráttur - tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla skal gerast upp - undir ávísum treytum gerast fyri kassafrádrátt, bonus, býtispening o.l., sum hava treytir, ið ikki eru loknar, tá ið latið (fakturerað) verður, men sum seinni verða effektivar.

Skrásett virki kunnu samhært hesum gera regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu, um fylgjandi treytir eru loknar:

- treytaði avslátturin skal viðvíkja latingum til eitt skrásett virki, sum tá ið inngangandi meirvirðisgjald skal gerast upp, kann rokna meirvirðisgjald av viðkomandi lating við í inngangandi avgjald, javnber § 15, 3. stk.,
- kreditnota skal útflýggjast yvir veittan avsláttur við upplýsing um meirvirðisgjald, javnber § 17, 1. og 2. stk.

Tá ið selt verður til ikki-skrásett virki, herímillum einstakar brúkarar, kann tílíkur frádráttur ikki gerast við uppgerð av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni, hóast treytaði avslátturin seinni verður effektivur, javnber § 7, 2. stk. litra e.

Til § 13, 8. stk.

Vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, sum meirvirðisgjald skal gjaldast av, tá ið tær vera tiknar burturúr

- til nýtslu hjá handhavara virkisins - til endamál, ið ikki viðvíkja sølu virkisins av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ella
- til tey í § 16, 3. stk. umrøddu endamál (t. d. gávur, matur ella onnur naturalløn til starvsfólkið), skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum, tá tey eru tikin í nýtslu.

VI. Avgjaldssatsurin

§ 14.

Avgjaldið er 20% av avgjaldsskyldugu søluni.

Til § 14.

Miðað verður ímóti, at meirvirðisgjald og tey punktgjøld, sum skulu vera framyvir, skulu geva landskassanum somu inntøku, sum núgaldandi tollskipan.

Útgangspunktið fyri valinum av 20% er búskapartøl fyri árið 1990.

Kanningar eru gjørdar av gott 400 vinnurokningskapum umboðandi allar vinnur. Stakroyndin er roknað upp, so ein fær eina fullfíggjaða mynd av tí meirvirðisgjaldsskylduga grundarlagnum. Út frá hesum er tað meirvirðisgjaldsskylduga grundarlagið (tær vinnur, ið standa í §§ 3 og 12 eru undantiknar, tó eru útflutningsvinnurnar við) í 1990 13,1 mia. kr. Uppií hesum tali er tó útflutningurin, sum í 1990 hevði eitt tal upp á 2,314 mia. kr. Hetta talið skal dragast frá fyri at fáa meirvirðisgjaldsskyldugu bruttosøluna, ið sostatt verður 10,786 mia. kr.

Hetta gevur við 20% í meirvirðisgjaldi eina bruttoinntøku upp á 2,157 mia. kr. Frá hesum skal dragast meirvirðisgjald av teimum vørum, sum tær meirvirðisgjaldsskyldugu fyritøkurnar nýta í sínum virksemi. Og aftrat skal leggjast meirvirðisgjald fyri innfluttar vørur og tænastur.

Í 1990 nýttu meirvirðisgjaldsskyldugu vinnurnar (útflutningsvinnur tó frokn-aðar) meirvirðisgjaldsskyldugar vørur og tænastur fyri 10,0 mia. kr. Tað merkir, at vinnurnar kunnu draga 2,00 mia. kr. frá.

Eftir eru 157 mió. kr. í nettoinntøku hjá landskassanum.

Afturat skal so leggjast meirvirðisgjald av innfluttum vørum og tænastum. Vøruinnflutningurin (skip frároknað) í 1990 var 1,88 mia kr. 20% av hesum er 376 mió kr.

Tilsamans 533 mió. kr.

Landskassin hevði eina inntøku upp á umleið 155 mió. kr. í tolli, punktgjøldum og framleiðslugjøldum av tubbaki, spiritusi, víni og luktilsi. Roknað verður her við, at hesi gjøld verða varðveitt.

Um meirvirðisgjald upp á 20% og tey nevndu punktgjøldini høvdu verið í gildi í 1990, so hevði landskassin tá fingið 688 mió. kr. í inntøku netto av hesum gjøldum.

Samlaða inntøka landskassans av tolli og framleiðslugjøldum í 1990 var 675 mió. kr.

Óvissurnar eru sera stórar í ásetingini av meirvirðisgjaldssatsinum.

Væntast kann, at bæði vinnumynstur og eftirspurningsmynstur fara at verða nógv ávirkað av umleggingini. Tær vinnur, har avgjaldstrýstið økist, fáa helst minni virksemi, og eftirspurningurin eftir teimum vørum, ið fáa minni avgjald, økist. Harumframt broytast sjálvsagt tær búskaparligu umstøðurnar annars ár undan ári.

Ásetingin av meirvirðisgjaldssatsinum er eisini ávirkað av, hvussu nógv ein ætlar at taka inn sum punktgjøld. Nevnt hevur verið, at nýggja spirituslóggávan fer at gera alkoholiskar drykkjuvørur bíligari, um ein ikki hækkar punktgjaldið. Í tann mun punktgjaldið verður hækkað, verður kravið til meirvirðisgjaldsinntøkuna minni. Nevnast skal eisini, at í omanfyri nevndu útrokning er meirvirðisgjald av innfluttum tænastum ikki tikið við, tí eingin skráseting er av hesum tænastum. Ein varislig meting er, at meirvirðisgjaldsinntøkan haðani hevði verið gott 20-30 mió. kr.

Talva: Høvuðsupphæddir fyri meirvirðisgjald (20%)

	Grundarlag Mia kr.	**Roknað meirvirðisgjald (20%)**
Samlaður bruttoumsetingur hjá m.v.g. skyldugum virkjum	13,100	
– Útflutningur hjá m.v.g.-skyldugum virkjum	- 2,314	
M.v.g. skyldugur bruttoumsetningur	10,786	2,157
Mvg. ið kann dragast frá í vinnu	- 10,000	- 2,000
Netto	0,786	0,157
Innflutningur, ið skal lata m.v.g.	+ 1,880	+ 0,376
Tilsamans	2,666	0,533
Innfluttar tænastur, ið lata m.v.g.	+ 0,125	+ 0,025
Tilsamans	2,791	0,558

Tað er ikki ráðiligt at seta meirvirðisgjaldssatsin lægri enn 20%, tí sum skilst eru óvissurnar sera stórar. Eisini kann ein tað fyrsta árið rokna við, at skiftisskipanir fara at seta krøv til landskassagjaldførið.

Roknast má við, at longu tá ið ein ársfjórðingur er farin av 1993, so má ein gera støðuna upp og meta um gongdina í inntøkunum frá meirvirðisgjaldinum. Um neyðugt má ein broyta satsin. Neyðugt verður kanska at gera hetta fleiri ferðir í 1993.

VII. Avgjaldið

§ 15.

Skrásett virki skulu fyri hvørt avgjaldstíðarskeið gjalda landskassanum munin millum útgangandi og inngangandi avgjald, javnber § 20. Er inngangandi avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið størri enn útgangandi avgjaldið fyri sama tíðarskeið, fær virkið munin endurrindaðan sambært reglunum í § 24.

2. stk. Útgangandi avgjaldið í einum avgjaldstíðarskeiði er avgjaldið av avgjaldsskyldugari sølu í tíðarskeiðinum, javnber V. kapittul.

3. stk. Inngangandi avgjaldið er avgjaldið sambært hesi lóg av keypi v.m. hjá einum virki av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum til nýtslu hjá virkinum, javnber tó § 16.

4. stk. Inngangandi avgjaldið í einum avgjaldstíðarskeiði er tað avgjaldið, sum í tíðarskeiðinum er fakturerað til eitt virki av latarunum, og tað avgjaldið, sum sambært § 27 er álagt teimum vørum, sum virkið í tíðarskeiðinum hevur innflutt fyri útlondum.

Til § 15

Avgjaldstilsvarið er munurin millum inngangandi og útgangandi meirvirðisgjald hjá einum virki í einum avgjaldstíðarskeiði (§ 15. 1. stk., samanber § 20). Er avgjaldstilsvarið negativt, fær virkið peningin útgoldnan.

Reglan um meirvirðisgjaldstilsvarið rúmar meginregluni í meirvirðisgjaldslógini. Hon avmarkar meirvirðisgjaldstilsvarið til avgjald av tí meirvirðinum, sum er komið aftrat í virkinum.

Útgangandi meirvirðisgjald í einum tíðarskeiði er avgjald av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu hjá einum virki í einum tíðarskeiði (§ 15. 2. stk.).

Útgangandi meirvirðisgjald er sostatt 20% av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni (§ 14), sum virkið ger upp fyri hvørt tíðarskeið, í samsvari við viðmerkingarnar til §§ 11, 12 og 13.

Inngangandi meirvirðisgjald í einum avgjaldstíðarskeiði er meirvirðisgjald av keypi v.m. av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, sum virkið hevur keypt, og sum verða brúktar av skrásetta virkinum (§ 15. 3. stk.).

Inngangandi meirvirðisgjald í einum avgjaldstíðarskeiði er tað meirvirðisgjald, sum í tíðarskeiðinum er fakturerað til virkið av latarunum. Harumframt kann meirvirðisgjald av innflutningi roknast við í inngangandi meirvirðisgjald, javnber § 15, 4. stk. og § 27. Í hesum sambandi er uttan týdning, um virkið hevur kredit uppá meirvirðisgjald av innflutningi.

Í § 16 eru ásettar nærri reglur um, í hvønn mun meirvirðisgjald av keypi kann roknast við til inngangandi meirvirðisgjald, og víst verður tí í hesum sambandi til viðmerkingarnar til nevndu grein.

§ 16.

Við í inngangandi avgjaldið verður bert roknað avgjald av innkeypi v.m., ið burturav viðvíkur sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

2. stk. Landsstýrið kann áseta reglur, soleiðis at nærri ásettir partar av inngangandi avgjaldi kunnu roknast av keypum v.m., ið ikki burturav viðvíkja sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum. Landsstýrið kann harumframt áseta reglur um regulering av frádrátti fyri inngangandi avgjald, tá íløgugøgn, herímillum føst ogn, gerast nýtsla, sum ber eina broyting við sær í rættinum til frádrátt. Regulering kann fara fram upp til 5 ár, fyri fasta ogn upp til 10 ár, eftir at íløgugøgnið er útvegað.

3. stk. Við í inngangandi avgjald kann ikki roknast avgjald av keypi v.m., sum viðvíkur:

a. Mati til handhavara og starvsfólkið á virkinum.
b. Útvegan og rakstur av íbúð fyri handhavara og starvsfólk á virkinum.
c. Naturaliusamsýting til starvsfólkið á virkinum.
d. Útvegan og rakstri av vøggustovu, barnagarði, frítíðarheimi, ferieheimi, summarhúsi o. t. fyri starvsfólkið á virkinum.
e. Umhoðan og gávum.
f. Útvegan og rakstri av persónakførum.

4. stk. Ríkis-, lands- og kommunalir stovnar av tí slagnum, sum eru nevndir í § 3, 1. stk. punkt d, kunnu einans rokna keyp v. m., sum viðvíkur tí partinum av sølu, sum er avgjaldsskyldugur, við í inngangandi avgjaldið. Hevur stovnurin sølu til útlond v. m., javnber § 12, 1-4 stk., kann avgjaldið av keypi viðvíkjandi hesum parti av sølu eisini roknast við í inngangandi avgjaldi .

5. stk. Verða vørur v. m., sum vera nýttar av handhavaranum á virkinum, roknaðar við í avgjaldsskylduga sølu hjá virkinum sambært § 11, 1. stk., kann avgjaldið av keypunum roknast við í inngangandi avgjaldið. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið verða nýttar til endamál, sum ikki viðvíkja sølu hjá virkinum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, ella til endamál sum nevnt í 3. stk.

6. stk. Virki, ið selja ella útleiga motorakfør ella reka koyriskúla, kunnu uttan mun til reglurna í 3. stk., punkt f, rokna avgjaldið av innkeypi v. m. til hesi endamál við í inngangandi avgjaldið.

Til § 16, 1. stk.

Sambært § 16, 1. stk. er tað bert meirvirðisgjald av keypi v. m., ið burturav viðvíkur sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ið skal roknast við í inngangandi meirvirðisgjald.

Inngangandi avgjaldið ella frádráttarretturin fevnir ikki bert um avgjald á tilfari, ið verður keypt til framleiðing av vørunt, og vørur, ið verða keyptar til at selja víðari, men eisini avgjald á aðrari nýútvegan, ið virkið fær útreiðslur av. Dømi um hetta eru lastbilar, skrivstovuinnbúgv, egið byggjarí og umvælingar, trygdarútgerð til virkið, herímillum eldsløkkingarútgerð. Blómur at fríða um matstovur og hárfríðkanarstovur. Vikubløð og tíðarrit, sum liggja frammi á hárfríðkanarstovum. Fakbløð og fakbøkur innan øki hjá virkinum.

Keyp, ið gevur rætt til frádrátt, kann t.d. setast upp soleiðis:

a) *søluvørur*

- vørur, keyptar at selja víðari ella at leiga út
- tilfar (rávørur og hálvfabrikata) at framleiða vørur
- vørur, ið verða nýttar at framleiða meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, t.d. eykalutir til umvælingar

b) *innbalding og flutningur*

- innbalding, t. d. pappír, plastposar, sekkir og kassar
- vøruflutningur, t. d. farmur og pakkaporto

c) *rakstrargøgn*

- bygging, umvæling og viðlíkahald av bygningum og aðrari fastari ogn, ið bert er til virkið at nýta (verksmiðjur, sølubúðir v.m.)
- rakstrargøgn, t.d. maskinur, amboð, útgerð til rannsóknarstovu og goymslur, innbúgv til verksmiðju, goymslu, sølubúð og skrivstovu, umvæling og viðlíkahald av hesum
- flutningsfør (fyri keyp og rakstur av bilum galda serligar reglur)
- útgerð til fiskifør

d) *útreiðslur*

- brennievni, ravmagn, gass og vatn til virki
- telefon, (telefax,) telex o. t.
- prentlutir og skrivstovulutir
- reingerð

- arbeiðsklæði og húnar, ið hoyra til virkið, og sum verða nýtt meðan arbeitt verður fyri virkið
- *lýsingar*
- sýnishutir og reklamulutir, t.d. bóklingar, uppritsbøkur, álmanakkar, kúlupenuar, øskubikar o. t., ið er hevur navn virkisins, vørumerkið ella tílíkt, og sum verður latið fyri eingi.

Í 3. stk. eru ásettar reglur um at nøkur ávís avgjøld ongantíð kunnu roknast við í inngangandi avgjaldið.

Til § 16, 2. stk.

Sambært 2. stk. ásetir landsstýrið reglur soleiðis, at ávísir partar av inngangandi avgjaldi kunnu roknast av keypum v.m., ið ikki burturav viðvíkja sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

Orsøkin til, at neyðugt verður at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi er, at nøkur virki fara at hava bæði meirvirðisgjaldsskylduga og meirvirðisgjaldsfría sølu, og tí fara hesi virki at gera keyp, ið bæði fara at verða brúkt í meirvirðisgjaldsskylduga og meirvirðisgjaldsfría partinum av virkinum.

Sum dømi um sovorðin virki kunnu nevnast:

- advokatar (meirvirðisgjaldsskyldugar advokattænastur og meirvirðisgjaldsfrí ognarumsiting)
- ognarmeklarar (meirvirðisgjaldsskyldugt ognarmeklaravirksemi og meirvirðisgjaldsfrítt ognarhandil)
- koyriskúlar (meirvirðisgjaldskyldug undirvísing viðvíkjandi vanligum koyrikorti og meirvirðisgjaldsfrí undirvísing viðvíkjandi vinnuligum koyrikorti)
- útleigingarvirksemi (meirvirðisgjaldsskyldug útleigan og meirvirðisgjaldsfrítt fíggjarvirksemi).
- vognmenn (meirvirðisgjaldsskyldugur vøruflutningur og meirvirðisgjaldsfrítt fólkaflutningur)
- skeiðvirksemi (meirvirðisgjaldsskyldugt ráðgevandi virksemi og meirvirðisgjaldsfrí undirvísing)

Neyðugt verður tí í kunngerð at áseta reglur um, at sovorðin virki bert hava lutfalsligan frádráttarrætt fyri keyp, sum bæði viðvíkur meirvirðisgjaldsskyldugum og meirvirðisgjaldsfrítum virksemi. Hetta er ofta skrivstovuinnbúgv, edvtól, telefonútreiðslur, streymur og hiti, høli og samsýningar til advokat og grannskoðara.

Lutfalsligi frádráttarrætturin fyri felagskeypini verður uppgjørdur eftir lutfallinum millum sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum (ikki íroknað meirvirðisgjald) og samlaða sølu (ikki íroknað meirvirðisgjald) hjá virkinum.

Søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum fevnir um ta sølu, ið meirvirðisgjald verður rindað fyri, og ta sølu, sum kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu (útflutning, sølu av tíðindabløðum og sølu, útleigan og umvæling av ávísum skipum og flogførum).

Samlað søla skal roknast sum søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum sum omanfyri frágreitt "íroknað" (aðra) sølu, herímillum søla av tænastum, ið eru frítiknar frá meirvirðisgjaldsskylduni.

Dømi:

a.	Meirvirðisgjaldsskyldug søla	900.000 kr.	
b.	Útflutningur	300.000 kr.	
d.	Søla av meirvirðisgjaldsfrítum tænastum		400.000 kr.
	Samlað søla	1.600.000 kr.	

Frádráttarrætturin er

Summar inntøkur kunnu í ávísum førum haldast uttanfyri samlaðu søluna, tá ið lutfalsligi frádráttarrætturin verður gjørdur upp. Mest umráðandi eru rentur og tílíkar fíggjarligar inntøkur, inntøkur frá sølu av størri rakstrargøgnum, fastari ogn og tilskoti.

Virki, ið umframt meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi reka (meirvirðisgjaldsfrítt) fíggjarvirksemi ella annars selja meirvirðisgjaldsfrían tænastur, skulu viðgera rentuinntøkur og tílíkar fíggjarligar inntøkur sambært fylgjandi reglum:

1. Rentuinntøkur frá fluttum (fremmandum) krøvum verða mett at stava frá fíggjarvirksemi og skulu tí altíð roknast við í samlaðu søluna, tá ið frádráttarprosentið verður gjørt upp, og ávirka tí frádráttarrættin negativt.
   Fremmand krøv eru krøv viðvíkjandi sáttmálum, sum virkið ikki sjálvt hevur gjørt við viðskiftafólk. Hetta er galdandi uttan mun til um kravið er fluttt til ognar, til trygdar ella til ognar við avtalu um regres (aftursókn).
2. Rentuinntøkur frá keypssáttmálum og avdráttarsáttmálum, sum eru gjørdir í samband við sølu og útleigan hjá virkinum av egnum vørum, verða mettar at stava frá meirvirðisgjaldsskyldugum virksemi og kunnu haldast uttanfyri samlaðu søluna.
   Ein bilasøla, ið fíggjar egna bilasølu, fær sostatt ikki avmarkaðan frádráttarrætt orsakað av rentuinntøkunum frá hesi sølu.
3. Rentuinntøkur og kursvinningur frá skuldarbrøvum, partabrøvum, peningi í peningastovni og tílíkum kann haldast uttanfyri samlaðu søluna, um hetta í mesta lagi er 10% av søluni av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum. Fer hetta upp um 10%, skal tað fult út roknast við í samlaðu søluna.

Virki, ið ikki reka fíggjarvirksemi umframt meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi, skulu ikki rokna rentur, kursvinning ella aðrar inntøkur av peningaflutningi við, tá ið hesar inntøkur eru av minni týdningi ella beinleiðis eru avleiðingar av meirvirðisgjaldsskyldugum virksemi.

Fylgjan av hesum er, at meginparturin av virkjum, sum hava inntøkur av omanfyri nevnda slagi, ikki fáa avmarkaðan frádráttarrætt orsakað av rentuinntøkum v. m.

Inntøkur frá sølu av maskinum og innbúgvi v.m. til keypsprís, ikki íroknaður meirvirðisgjald, sum er 50.000 kr. ella meiri og inntøkur frá sølu av fastari ogn, ið hevur verið nýtt til meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi, skulu ikki roknast við í søluuppheddirnar, tá ið lutfalsligi frádráttarrætturin verður gjørdur upp - hvørki í teljara ella nevnara.

Sama er galdandi fyri fasta ogn, tá ið ánarin sjálvboðin hevur verið skrásettur fyri útleigan.

Inntøkur frá sølu av fastari ogn, ið ikki hevur verið nýtt til meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi, skulu ikki roknast við í samlaðu søluna, tá ið frádráttarrætturin verður avgjørdur, um so er, at talan er um einstaka sølu av fastari ogn.

Ískoyti, sum meirvirðisgjald skal rindast fyri, skal roknast við í søluna.

Ískoyti, sum meirvirðisgjald ikki skal rindast fyri - meirvirðisgald skal bert rindast, tá ið móttakarin beinleiðis ella óbeinleiðis ger nakað aftanfyri - skulu ikki roknast við í samlaðu søluna.

Frádráttarprosentið verður gjørt upp við endan á roknskaparárinum.

Meirvirðisgjald av keypi, ið fer fram gjøgnum árið, kann roknast við í meirvirðisgjald av keypi grundað á frádráttarprosentið fyri undanfarna roknskaparárið (ella undanfarna ársfjórðingin, um talan er um eitt nýstovnað virki). Endalig regulering skal fara fram við endan á roknskaparárinum.

Frádráttarrætturin fyri keyp, ið umframt at viðvíkja meirvirðisgjaldsskyldugum virksemi, eisini verður brúkt privat t. d. telefon, streymur, hiti, brennioljа osfr., verður gjørdur upp eftir einari meting.

Tá ið tollvaldið metir, um meirvirðisgjald er javnt býtt á virkið og á egna nýtslu, verður grundarlagið vanliga tann meting, sum er góðkend av líkningarráðnum.

Í kunngerð, ið verður gjørd við heimild í hesari grein í løgini, verða ásettar serligar reglur um frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald viðvíkjandi fastari ogn. Munur verður gjørdur á:

- bygging
- umvæling og viðlíkahaldi av bygningum
- hølum, ið verða nýtt blandað aðrari fastari ogn enn bygningum

Eingin frádráttarrættur er fyri meirvirðisgjald av útreiðslum til høli, ið verða nýtt sum íbúð hjá handhavara ella hjá starvsfólki á einum virki. Hetta er galdandi uttan mun til um hølini samstundis eisini verða nýtt í arbeiðinum hjá viðkomandi. Tað er sostatt eingin frádráttarrættur fyri meirvirðisgjald viðvíkjandi bygging, rakstri og viðlíkahaldi av hølum, ið kunnu metast at vera ein partur av sjálvari íbúðini, herímillum onnur vanlig høli at búgva í. Hetta er t.d. galdandi fyri fýrrúm, pultikamar, skrivstovu, teknistovu og tílíkt og vanligar garasjur, sum eru bygd saman við íbúðini.

Tílík høli kunnu ikki metast burturav at vera bygd til nýtslu hjá virkinum, tá ið hølini eftir innrættingini at døma og alt eftir, hvar tey liggja í mun til egnu íbúð handhavarans og alt eftir ítøkiligum umstøðum annars í hvørjum einstøkum føri, (herímillum t. d. hvussu stór vinnuhølini eru og hvar tey liggja), kunnu metast at vera ein partur av hølum virkisins.

Tá ið avgerast skal, um frádráttarrættur kann fáast viðvíkjandi hølum í egnari íbúð hjá handhavara, verður dentur lagdur á, at hølini eru skild frá íbúðini og liggja soleiðis fyri, at hølini ikki kunnu metast at vera ein integreraður partur av íbúðini. Um hølini liggja soleiðis fyri, at neyðugt er at fara ígjøgnum tey fyri at fáa atgongd til egna íbúð, verða hølini sum meginregla mett at vera ein integreraður partur av íbúðini, og hervið hava tey ongan møguleika fyri frádráti av meirvirðisgjaldi av keypi.

Meirvirðisgjald viðvíkjandi bygging, herímillum at byggja uppí, sum umframt høli til skrásett virki eisini innihalda onnur høli, verður roknað við í meirvirðisgjald av keypi eftir einari meting, ið er grundað á lutfallið millum byggitút-reiðslurnar av hølunum hjá virkinum og samlaðu byggiútreiðslurnar.

Hava tey ymsu hølini sama standard, hvat bygging viðvíkur, kann tann parturin av meirvirðisgjaldi, sum hevur frádráttarrætt, roknast út eftir lutfallinum millum arealið á teimum hølunum, ið hava frádráttarrætt, og samlaða arealið á bygningunum.

Meirvirðisgjald av arbeiði við umbygging, umvæling og viðlíkahaldi av bygningum, ið bæði innihalda høli við frádráttarrætti og høli við ongum frádráttarrætti, kann roknast við í meirvirðisgjald av keypi í tann mun, arbeiðið beinleiðis kann vísast aftur til høli við frádráttarrætti (t. d. máling av einari damuhárfríðkanarstovu í einum sethúsum). Tað er ein treyt, at latarin býtir prísin fyri arbeiðið á fakturanum.

Kann meirvirðisgjald ikki vísast beinleiðis til tey einstøku hølini í bygningunum, t. d. viðlíkahald uttan, umvæling og skifting av hitaverki ella aðrari felags installatión, verður tann parturin, sum hevur frádráttarrætt roknaður eftir lutfallinum millum høli við frádráttarrætti og samlaða arealið á bygninginum.

Meirvirðisgjald av keypi viðvíkjandi høltum hjá einum virki, ið bæði verða nýtt í samband við sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum og í samband við sølu av meirvirðisgjaldsfrítum tænastum, verður gjørdur upp eftir einari meting. Hetta er t. d. galdandi fyri viðlíkahald av høli hjá ognarmeklara, ið frá sama høli rekur bæði meirvirðisgjaldsskyldugt ognarmeklaravirksemi og meirvirðisgjaldsfrían ognarhandil.

Tá ið meirvirðisgjald fyri høli til blandaða nýtslu verður býtt eftir einari meting, verður hetta vanliga gjørt grundað á sølubýti, t. e. søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í mun til samlaðu søluna.

Neyðugt verður at áseta serligar reglur fyri hotell o. t., sum leiga út høli (salir) til fundir. og onnur tiltøk, og fyri útróttarhallir, ið av og á verða nýttar til meirvirðisgjaldsskyldug tiltøk, sum t. d. konsertir.

Meirvirðisgjald viðvíkjandi anleggi, umvæling og viðlíkahaldi av aðrari fastari ogn, enn bygging (grundir, havnir v. m.) kann - alt eftir nýtslu - roknast við í meirvirðisgjald av keypi eftir meginreglunum viðvíkjandi keypi til blandaða nýtslu ella viðvíkjandi keypi til lutfalsliga egna nýtslu.

Viðvíkjandi last- og vøruvognum, hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons, verða ásettar serligar reglur.

Serligar reglur verða ásettar orsakað av, at eitt munandi tal av virkjum, ið sum eyðkenni brúka akførini bæði til meirvirðisgjaldsskyldug og meirvirðisgjaldsfrí endamál, nevniliga egna koyring.

Reglurnar merkja:

at tað er bert frádráttarrættur fyri meirvirðisgjald av keypi, tá ið akfarið burturav verður nýtt í samband við sølu hjá virkinum av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, og

at meirvirðisgjald av rakstri av hesum akførum (brennievni, vasking, umvæling og viðlíkahald) fult út kann roknast við í meirvirðisgjald av keypi, hóast akfarið bert lutfalsliga verður nýtt av virkinum.

Það, sum so er avgerandi, er, nær ið akførini burturav verður nýtt til meir-virðisgjaldsskyldugt virksemi, so virkið hevur frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av keypi.

Tá ið metast skal um frádráttarrættur er fyri meirvirðisgjald av keypi, verður støða tikin til:

- um akfarið verður nýtt til veruligan flutning millum handilin hjá virkinum og egna íbúð
- um akfarið verður nýtt at koyra millum íbúð og skiftandi arbeiðspláss
- um avtala er gjørd millum virkið og brúkaran um nýtsluna
- um akfarið hevur amboð ella tílíkt (montørvognar), ella um goynsla er stovn-

að í íbúð hjá starvsfólki við tí fyri eyga, at hava kallitænastu til umvæling ella tílíkt

- um virkið hevur fulla avskriving, hvat skatti viðvíkur, uppá akfarið, og
- um skattur verður álagdur brúkaranum fyri nýtsluna.

Koyring millum heim og arbeiðspláss verður vanliga ikki rokna at vera koyring, ið viðvíkur virkinum. Tó verður koyring millum íbúð og skiftandi arbeiðspláss, herímillum av og á til fast handilsstað, mett at vera koyring fyri virkið.

Fyri at skipanin um fullan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av rakstrarútreiðslum ikki skal verða misnýtt, verður ásett, at bert virki, hvørs árliga søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í minsta lagi er 10.000 kr., kunnu rokna meirvirðisgjald í samband við rakstur av vøruvogni við í meirvirðisgjald av keypi.

Fyri leigaðar last- og vøruvognar, hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons, sum ikki burturav verða nýttir av virkinum, kann - umframt meirvirðisgjald viðvíkjandi raksturi - 1/3 av meirvirðisgjald av leiguni roknast við í meirvirðisgjald av keypi.

Lutfalsligur frádráttarrættur fyri last- og vøruvognar, hvørs totalvekt er yvir 4 tons, fylgir vanligu reglunum viðvíkjandi lutfalsligum frádráttarrætti.

Fyri at virki ikki skulu kunna spekulera uppá landskassans rokning, verður eisini neyðugt at áseta nærri reglur í kunngerð við heimild í § 16, 2. stk. um regulering av meirvirðisgjaldi í førum, tá ið íløgugøgn verða hrúkt til onnur endamál, sum hava við sær broyting í frádráttarrættinum.

Skylda at regulera hevur til endamáls at javna meirvirðisgjald av keypi av størri keypum yvir eitt tíðarskeið, sum er 5 ár fyri rakstrargøgn og 10 ár fyri fasta ogn, soleiðis at frádráttarrætturin ikki bert er treytaður av frádráttarrættinum hjá virkinum fyri tað árið, sum gøgnini vóru keypt í, men lagar seg eftir (støri) árligum broytingum í frádráttarprosentinum.

Íløgugøgn fevnir um:

- Maskinur, innbúgv og onnur rakstrargøgn, hvørs keypsprísur, ikki íroknaður meirvirðisgjald, fer upp um 50.000 kr., og sum er undir virðisminkan.

Hetta merkir, at meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal fara upp um 50.000 kr. Meirvirðisgjaldsskylduga virðið fyri nýggjar bilar er virðið ikki íroknað meirvirðisgjald og skrásetingargjald.

Málningar, standmyndir, aðrir listaligir lutir og ektað teppi verða mett - í tann mun frádráttarrættur er fyri tey, tá ið tey verða keypt - sum rakstrargøgn, ið ikki eru undir virðisminkan.

- Fasta ogn.
- Arbeiði av at byggja uppí og umhygging ella av at gera nútíðarhóskandi og

umvæla og viðlíkahalda fasta ogn fyri eitt samlað meirvirðisgjaldsskyldugt virði, ið er meiri enn 50.000 kr.

Regulering av meirvirðisgjaldi av keypi av fløgugognum verður bert gjørd, um broytingar eru í frádráttarrættinum innan reguleringsfíðarskeiðið.

Fyri fasta ogn og fyri arbeiði av uppí- og umbygging v.m. av fastari ogn er reguleringsfíðarskeiðið tey fyrstu 10 roknskaparárini eftir keypið, íroknað tað roknskaparárið, sum fløgugognin eru keypt í. Tá ið fost ogn verður bygd, er tann dagurin, tá ið bygningurin kann takast í nýtslu, keypsdagurin.

Fyri onnur fløgugogn (maskinur, innbúgv v.m.) er reguleringsfíðarskeiðið fyrstu 5 árini aftaná keypsdagin.

Regulering skal gerast í hesum førum:

1. Tá ið tey fløgugogn, sum virkið við keyp hevur havt fullan ella lutfalsligan frádráttarrætt fyri, fara yvir til aðra nýtslu, sum virkið ikki hevur frádráttarrætt fyri.

Hetta er t. d. galdandi fyri uppítoku av hoyrum hjá virkinum ella einum parti av hesum til íbúð hjá handhavara ella starvsfólki.

Tá ið sjálvstøðugt skrásett virki verða samanloyd (fusionerað), kann ikki sleppast undan uppgerð av møguligari reguleringsskyldu.

2. Tá ið fløgugogn, sum virkið tá ið keypt varð, hevði fullan frádráttarrætt fyri, fara yvir til aðra nýtslu, sum virkið hevur lutfalsligan frádráttarrætt fyri, t. d. teoriholi í einum koyriskúla, ið burturav hava verið nýtt til meirvirðisgjaldsskylduga undirvísing, sum byrjar við meirvirðisgjaldsfriari koyriundirvísing.
3. Tá ið grundarlagið fyri lutfalsligan frádráttarrætt verður broytt, so virkið fær nítti lutfalsligan frádráttarrætt.

Fær eitt virki stórri rætt til frádrátt enn tá ið keypt varð, kann regulering fara fram. Hevði virkið ikki frádráttarrætt, tá ið keypt varð, kann regulering ikki fara fram, hóast virkið seinni nýtir fløgugognini til endamál, ið hevur frádráttarrætt.

Regulering skal ikki gerast í hesum førum:

1. Tá ið maskinur og onnur rakstrargogn hjá virkinum verða seld, um so er, at meirvirðisgjald verður roknað við sølu, ella um vørurnar verða nýttaðar.

Meirvirðisgjaldsfrí avhending av rakstrargognum í sambandi við heila ella lutfalsliga avhending av virki samanber § 12, 5. stk., í meirvirðisgjaldslógini er har afturímóti umfevnd av reguleringsskyldunni, ið kortini kann flytast til nýggja virkið, sjá niðanfyri.

2. Tvingsilssøla av fastari ogn ella rakstrargøgnum hjá virki.
3. Smærri broytingar í frádráttarprosentinum. Regulering skal ikki fara fram, um broytingin í frádráttarprosentinum er minni enn 10 í mun til frádráttarprosentið, tá ið keypt var. Lækkar frádráttarprosentið frá 75, tá ið keypt var, til 66 innan reguleringstíðarskeiðið, skal sostatt ikki regulerast.

Tá ið føst ogn verður seld, og tá ið maskinur og onnur rakstrargøgn verða avhendað sambært § 12, 5. stk. í meirvirðisgjaldslógini, hevur seljarin skyldu at regulera.

Tó verður møguleiki fyri, at ein tílík reguleringsskylda heilt ella lutfalsliga kann flytast til keyparan, treytað av at keyparin váttar, at hann vil átaka sær reguleringsskylduna fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum.

Hevur keyparin í minsta lagi sama frádráttarrætt fyri íløgugøgnini, sum seljarin hevði, tá ið keypt varð, kann keyparin taka yvir alla reguleringsskylduna fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum.

Hevur keyparin minni frádráttarrætt enn seljarin, kann keyparin taka yvir tann partin av reguleringsskylduni hjá seljaranum, ið svarar til frádráttarrættin hjá keyparanum fyri íløgugøgnini. Restin av reguleringsskylduni skal tá eftirregulerast av seljaranum.

Tá ið føst ogn verður seld og framvegis nýtt til endamál við frádráttarrætti, kann tollvaldið, tá ið keyparin játtar at taka yvir reguleringsskylduna fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum, loyva, at trygd verður sett fyri reguleringsskylduni.

Regulering í teimum einstøku roknskaparárunum verður fyri fasta ogn og fyri uppí- og umbyggingararbeiði v. m. av fastari ogn gjørd við 1/10 og fyri onnur íløgugøgn við 1/5 av somu meirvirðisgjaldsupphædd, sum varð goldin, tá ið umrøddu íløgugøgnini vóru keypt.

Reguleringin skal fara fram grundað á tær broytingar í frádráttarrættinum, sum henda innan tað einstaka roknskaparárið í mun til frádráttarrættin í tí roknskaparárinum, tá ið umrøddu íløgugøgnini eru keypt.

Fara íløgugøgn frá fullum ella lutfalsligum frádráttarrætti yvir til at verða nýtt til endamál, ið ikki hevur frádráttarrætt, skal regulerast fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum.

Fylgjandi dømi lýsa reglurnar um uppgerð av reguleringsupphæddum.

Í dømunum er tað ein fyritreyt, at virkini nýta álmanakkaárið sum roknskaparár.

Dømi 1

Virkið A keypti í mai mánaða 1985 eina maskinu. Í samband við keypið roknaði virkið 30.000 kr. við í meirvirðisgjald av keypi. Tá ið virkið í juli mánaða 1988

sleðgar meirvirðisgjaldsskrásetningini fer maskinan yvir til nýtslu, ið ikki hevur frádráttarrætt.

Í hesum fýri skulu 12.000 kr. regulerast. Hetta verður funnið soleiðis:

Frádráttur tá ið keypt var	30.000 kr.
Lækking við 1/5 av frádráttinum fyri hvørt roknskaparár, ið er farið (endað) síðani keypt varð	
1985	6.000 kr.
1986	6.000 kr.
1987	6.000 kr. 18.000 kr.
Reguleringsupphæddi	12.000 kr.

Dømi 2

Virkið B. ið vanliga hevur bæði meirvirðisgjaldsskyldugan og meirvirðisgjaldsfrían aktivitet, keypti í 1985 eina olv-skipan. Meirvirðisgjald av keypsprísinum var 500.000 kr., sum svaraði til ein árligan part uppá 100.000 kr. (1/5). Virkið hevði í 1985 80% av frádrátti og roknaði tí 400.000 kr. við í meirvirðisgjald av keypi.

Í 1986 minkaði virkið sítt meirvirðisgjaldsfríða virksemi, soleiðis at frádráttarprosentið fyri 1986 hækkaði til 89. Hendla broyting í frádráttarprosentinum førdi tó onga regulering við sær, við tað at broytingin er minni enn 10 í mun til dagin, tá ið keypt varð (80%).

Í 1987 hevði virkið omki meirvirðisgjaldsfrítt virksemi - tað merkir fullan frádráttarrætt. Sostatt fekk virkið rætt til at kompensera fyri okta frádráttarrættin í mun til dagin, tá ið keypt varð. Reguleringsupphæddin verður roknað grundað á ársins "part" av goldnum meirvirðisgjaldi (100.000 kr.) og á broytingina í frádráttarrættinum (20%), tað merkir: 20% av 100.000 kr. = 20.000 kr.

Í 1988 tók virkið meirvirðisgjaldsfría virksemi uppaftur, so at ársins frádráttarrættur gjørdist 65. Parturin uppá 80.000 kr. tann dagin, tá ið keypt var, hevur sostatt verið av stórur, og virkið skal minka meirvirðisgjald av keypi við 15% av 100.000 kr. = 15.000 kr.

Í 1986 gerst frádráttarprosentið 75. Hendla broyting førir onga regulering við sær, við tað at hon er minni enn 10.

Síðani er reguleringstíðarskeiðið liðið, og broytingar í frádráttarrættinum í 1990 og seinni føra onga regulering við sær - heldur ikki um so er, at frádráttarprosentið í einum ella fleiri av hesum roknskaparárum verður nátt. Verður anleggið selt, skal meirvirðisgjald rindast av søluprísinum samsvarandi vanligu reglunum í meirvirðisgjaldslógini.

Reguleringin kann setast upp á hendan hátt:

Keypsár: 1985
Meirvirðisgjaldsupphædd: 500.000 kr.
Frádráttur, tá ið keypt varð: 80% (400.000 kr.)

Roknskaparár	Frádráttarprosent	Reguleringsupphædd
1985	80	
1986	89	
1987	100	+ 20.000 kr.
1988	65	- 15.000 kr.
1989	75	

Til § 16, 3. stk.

Í § 16, 3. stk. eru nevnd ymisk keyp, sum virki ikki hava frádrátt fyri. Í hesum sambandi ger tað ongan mun, um keypini viðvíkja sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Niðanfyri eru gjørdar nakrar viðmerkingar til tey einstøku undantøkini:

Til § 16, 3. stk. a

Tá ið inngangandi avgjald hjá einum virki verður uppgjort, kann avgjald av hotelluppihaldi og mati hjá montøri og øðrum starvsfólki, meðan tey hava arbeitt uttanbýggja, ikki roknast við. Avgjald á útreiðslum til flutning av tilfari og amboðum v. m. kann roknast við í inngangandi avgjald hjá virkinum, meðan avgjald á ferða- og uppihaldsútreiðslum og mati til starvsfólkið ikki kann roknast við í inngangandi avgjaldið.

Til § 16, 3. stk. b

Sambært hesi reglu er ikki frádráttarrættur fyri avgjald av bygging, raksturi og viðlíkahaldi av hølum, ið kunnu roknast at vera ein partur av privatu íbúð handhavarans v. fl., uttan nakað tað, um hølini eisini verða nýtt í arbeiðinum hjá umvøldu. Tað kann bert vera frádráttarrættur fyri hølir við tilknýti til privata íbúð, um hølini kunnu metast at vera partur av hølum virkisins. Avgerandi fyri hetta er, hvussu hølini eru innrættað, og hvussu tey liggja í mun til privatu íbúðina hjá handhavara.

Til § 16, 3. stk. c

Avgjald á útreiðslum í samband við veitslu fyri starvsfólkið kann ikki roknast við í inngangandi avgjald.

Til § 16, 3. stk. e

Sambært hesi reglu er eingin frádráttarrættur fyri keyp til umboð og gávur. Reglan fevnir hartfturímóti ikki um keyp til reklamu og sýnisvørur, og sostatt

verður frádráttarrættur fyri avgjald av keypi til reklamulutir. Neyðugt verður tí, at taka støðu til, nær talan er um gávur og nær talan er um reklamur. Viðvíkjandi reklamulutum er meginreglan, at hesir verða gjørdir í stórum tali og hava eitt lítið virði.

Hetta kann t. d. vera tendrarar ella lyklaringar, ella tílíkt við áprentaðum búmerki, ið verður gjørt í einum so stórum tali, at tað virkar sølufremjandi. Tað, sum sermerkir eina gávu, er harafturímóti, at hon umboðar eitt virði, og at hon ikki hevur sølufremjandi endamál sum so.

T. d. verða vanligar vørur sum kikarar, vínfløskur, barometur, ur o.a., roknað sum gávur. Keypir eitt virki 500 ur við áprentaðum búmerki fyri 30 kr. stykkið við tí endamáli at geva viðskiftafólkinum hesi, tá ið tey keypa vørur, hevur virkið frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald á keypinum, tí at hetta má metast at vera reklamulutir.

Til § 16, 3. stk. f

Sum dømi um hesa reglu kunnu útreiðslur til handilsmáltíðir ikki roknast við til inngangandi avgjaldið.

Til § 16, 4. stk.

Ríkis-, lands- og kommunalir stovnar kunnu bert rokna meirvirðisgjald av keypi, sum viðvíkur meirvirðisgjaldsskyldugari sølu, og avgjald av keypi viðvíkjandi møguligari útflutningssølu við í inngangandi meirvirðisgjald (§ 16. 4. stk.).

Fyri at sleppa undan tvíavgjaldi er ásett í § 16, 5. og 6. stk., at virki, ið skulu gjalda avgjald sambært § 11, 1. stk., og virki, ið útleiga motorakfør, ella koyriskúlar, kunnu rokna avgjald av keypum til hesi endamál við í inngangandi avgjald.

Niðanfyri eru gjørdar nakrar viðmerkingar til, hvat ið annars kann roknast við í inngangandi avgjald sambært § 16.

1) Skaðar

Tá ið skaði er hendur á goymslu ella rakstrargøgn hjá skrásettum virki, herímillum bygningar, kann virkið rokna avgjald á keypi, umvæling v.m. til umbót av skaðanum við í inngangandi avgjald í sama mun, sum virkið sambært vanligu reglunum í §§ 15 og 16 í løgini kann rokna avgjald á keypi v.m. av viðkomandi vørum og rakstrargøgnum við í inngangandi avgjald.

Hetta er galdandi, hóast virkið (tann, ið hevur verið fyri skaða) sjálvur má bera tapið av skaðanum, ella um tað kann fáa tapið rindað við endurgjaldi frá skaðavaldara ella tryggingarfelagi.

Tað tap, sum í seinasta føri skal endurrindast, verður sostatt við í (endurkeypsprísurin, umvælingarprísurin) ikki roknað avgjald.

Hevur tann, ið hevur verið fyri skaða bert lutfalsligan frádráttarrætt, verður tann partarin av avgjaldinum, sum tann skaddi ikki kann rokna við í inngangandi avgjaldið, lagdur aftrat tí tapi, ið skal endurrindast, virðinum (endurkeypsprísinum, umvælingarprísinum).

Um tann, ið hevur verið fyri skaða, er eitt skrásett virki og sjálvt botnar um skaða á vøru ella rakstrargogn, sum tað hevur frádráttarrætt fyri, skal virkið ikki rokna avgjald av útreiðslunum (tilfari, arbeiðslon v.m.).

Um virki, ið hevur verið fyri skaða, hevur lutfalsligan frádráttarrætt, skal tað rinda avgjald, í tann mun tað ikki hevur frádráttarrætt.

Í teimum førum har tann, ið hevur verið fyri skaða, er einstaklingur ella eitt ikki skrásett virki, verður tað tap, ið møguliga skal endurrindast av skaðavaldara ella tryggingarfelagi, virðið (endurkeypsprísurin, umvælingarprísurin) roknað avgjald.

Sama er galdandi, tá ið skaðin rakar ogn hjá einum skrásettum virki, sum tað ikki hevur frádráttarrætt fyri.

Skrásettur skaðavaldari, ið skal endurgjalda skaða, iroknaðan avgjald, kann ikki rokna hetta avgjald við í inngangandi avgjaldið.

Ger eitt skrásett virki skaða á vøru, sum eru í varðveitslu ella til umvælingar hjá virkinum, kann hetta virkið tó mótrokna avgjaldið viðvíkjandi umvæling av tí skaða, sum virkið hevur gjørt, við í inngangandi avgjald, men tann, ið hevur verið fyri skaða, hevur í hesum føri ongan frádráttarrætt fyri avgjaldið.

Umbót av stormskaða á bygning í gerð verður mettur javnt við skaða á egnar vørur. Um ein byggiharri hevur teknað stormskaðatrygging, áðrenn farið verður undir at byggja, og um tað sambært byggisáttmálanum um arbeiði við at gera bygningin er byggiharrin, ið hevur ábyrgdina av at tekna brunatrygging, men entreprenørurin, ið hevur ábyrgdina av tí arbeiði, sum hann annars ger, til bygningurin er liðugur og verður tikin í nýtslu, so má entreprenørurin metast at vera tann, sum hevur verið fyri skaða, og tá ið hann sjálvur botnar skaðan, kann hann tí lata vera at rokna avgjald av útreiðslunum av hesum. Meirvirðisgjald skal sostatt ikki setast á rokningina til tryggingarfelagið.

Tá ið talan er um flutningsskaða, har vøru verða mistar undir sending frá einum skrásettum virki, og seljarin hevur ábyrgdina av sendingini, skal seljarin ikki rinda avgjald av vørunum. Tað tap, ið møguliga skal endurgjaldast av flutningsmanninum, er sostatt vøruprisurin, ikki íroknaður avgjald.

Í teimum førum, har vøru verða mistar í flutningi millum tvey skrásett virki, og keyparin hevur ábyrgdina av sendingini, kann keyparin rokna avgjald av vørunum við í inngangandi avgjaldið. Tað tap, ið møguliga skal endurgjaldast, er sostatt vøruprisurin, ikki íroknaður avgjald.

Verða vørur mistar undir sending frá einstaklingi ella ikki skrásettum virki, er tað tap, ið møguliga skal endurgjaldast, virðið á vørunum, íroknað avgjald.

Sama er galdandi, tá ið móttakarin hevur ábyrgdina av sendingin, um vørur verða mistar undir sending frá skrásettum virki til einstakling ella til ikki skrásett virki.

Fyri vørur, ið verða skaddar undir flutningi, eru somu reglur galdandi sum fyri vørur, ið verða mistar við flutning.

Tað avgjald, ið er roknað við í útgoldið endurgjald, kann ikki roknast við í inngangandi avgjaldið.

Avgjald av skeytis- og meklarasamsýningum í samband við handil við vinnuligari ogn, sum seljarin hurturav hevur nýtt til rakstur av skrásetingarskyldugum virki, kunnu roknast við í inngangandi avgjaldið. Sambært kunngerð um lutfalsligan frádráttarrætt kann avgjaldið dragast frá lutfalsliga, um samsýningarnar viðvíkja ogn, ið bæði hevur verið nýtt til skrásetingarskyldugt virki og ikki skrásetingarskyldugt virki ella til egin endamál.

Avgjald á keypi av lærubókum og øðrum undirvísingartilfari kann roknast við í inngangandi avgjaldið, í tann mun útreiðslurnar viðvíkja útbúgving av lærlingum ella aðrari fakligari útbúgving, ið verður krevd av og fult goldin av skrásettum virki. Avgjald á keypi til aðra útbúgving, kann harafturímóti ikki roknast við í inngangandi avgjaldið.

Tann, ið tekur ímóti endurgjaldi, skal ikki rinda meirvirðisgjald av peningunum, uttan so at hetta má metast at vera heilt ella lutfalsligt gjald fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar.

Meginreglan er, at tað endurgjald, sum entreprenørar v.fl. skulu veita byggiharranum sum rind fyri uppgjørdan eykakostnað (íroknaður meirvirðisgjald), sum stendst av, at arbeiðið er seinkað ella ikki gjørt, ikki kann geva umrøddu entreprenørum grundarlag fyri at rokna nakran part av endurgjaldinum við í inngangandi meirvirðisgjald. Talan skal vera um eitt reint endurgjald, við tað at eingin meirvirðisgjaldsskyldug tænasta er latin sum samsýning fyri endurgjaldið.

2) Afturtøka

Tá ið meirvirðisgjald verður gjørt upp í samband við afturtøku av rakstrargøgnum v.m., ið eru seld til avgjaldingar og við ognarfyrivarni, má skiljast ímillum, um rakstrargøgnini v. m. verða tikin fyri sambært galdandi ognarfyrivarni av upprunaliga seljaranum ella av øðrum virki t.d. einum fíggjarstovni.

Seljarin (latarin) kann gera regulering av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni við tí upphædd (ikki íroknað meirvirðisgjald), ið verður samsýnd/góðskrivað keyparanum í samband við afturtøkuna sambært vanligu reglunum í lógini. Hetta er treytað av, at kreditnota verður útfylt/gjørd.

Í førum tá ið vørur og rakstrargøgn v. m., sum eru keypt til avgjaldingar við ognarfyrivarni, og til hvørs inngangandi meirvirðisgjald keyparin hevur frádráttarrætt fyri, verða afturtikin, skal inngangandi meirvirðisgjald (grundað á kredit-

nota, sum seljarin hevur útflýggjað) lækkast við meirvirðisgjaldi av tí virðinum, sum við afturtøkuna er góðskrivað fyri umrøddu rakstrargøgn v.m.

Við afturtøku av vørum og rakstrargøgnum v.m. hjá einum trotabúgvi ella tílíkum, verður gjørt á sama hátt, sum omanfyri nevnt.

Tollvaldið fráboðar meirvirðisgjald í búgvinum sum einfalt krav (simpel fordring). Í førum har trotabúgv velja at yvirtaka avtaluna, verður meirvirðisgjald viðvíkjandi afturtøkuni í búgvinum fráboðað sum hópkrav (massekrav). Meirvirðisgjald viðvíkjandi afturtøku (afturkeypi) av vørum v. m., ið er selt til avgjaldingar við ongum ognarfyrivarni, men við trygd í leysoyrapantibrævi, verður altíð fráboðað í búgvinum sum hópkrav.

Afturtøka framd av tíggjarstovnum

Ein tíggjarstovnur - ella eitthvørt annað virki enn upprunaligi seljarin - ið hevur tikið yvir ein sáttmála við ognarfyrivarni, má ikki í samband við yvirtøkuna útflýggja kreditnota við fráboðaðum meirvirðisgjaldi - heldur ikki um stovnurin er skrásettur fyri at hava selt umrøddu vørur, við tað at talan ikki er um returvørur.

Tað verður heldur ikki góðkent, at stovnurin í sovorðnum føri útflýggjar avrokningarskjal við tilskilaðum meirvirðisgjaldi, við tað at eingin vanligur handil er gjørdur.

Í relatión til keypara kann sígggjast burtur frá regulering av tí meirvirðisgjaldi, ið er drigið frá við keypið - eisini um keyptu rakstrargøgnini v.m. eru umfevnd av reglum um fløgugøgn.

Í sambandi við yvirtøku av trotabúgvi (konkursbo) verður eingin regulering gjørd av meirvirðisgjaldi.

3) Uppgerð av inngangandi meirvirðisgjald

Inngangandi meirvirðisgjald í einum meirvirðisgjaldstíðarskeiði er tað meirvirðisgjald, sum latararnir hava fakturerað til virkið í tíðarskeiðinum, og sum virkið sambært galdandi reglum hevur frádráttarrætt fyri.

Tað er sostatt fakturadagfestingin, ið er avgerandi fyri í hvørjum tíðarskeiði, meirvirðisgjaldsupphæddin kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjaldið.

Harafturímóti er ikki neyðugt fyri at kunna gera frádrátt, at tilfaktureraða meirvirðisgjaldsupphæddin er goldin. Meirvirðisgjald viðvíkjandi t.d. einari maskinu, ið er keypt til avgjaldingar við ognarfyrivarni, kann sostatt roknast við í inngangandi meirvirðisgjaldið longu tann dagin, tá ið tað verður fakturerað (samanber viðmerkingar til § 13).

Sostatt fellur dagurin, tá ið latarin skal rokna fakturaraðar vørur og tænastur við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna saman við degnum, tá ið keyparin kann rokna meirvirðisgjald av hesum við í inngangandi meirvirðisgjaldið.

Fyri at kunna fáa frádrátt fyri inngangandi meirvirðisgjald, er tað ein vanlig treyt, at fakturar, ið lúka ásett krov, kunnu vísast sum skjalprógv. Keypssáttmálar - t. d. viðvíkjandi motorakforum - verða ikki mettir at lúka krov til fakturar og kunnu ikki nýtast til prógv fyri inngangandi meirvirðisgjald.

Meirvirðisgjald av keypi til nýtslu hjá virkinum, ið er fakturerað til og goldið av virkinum, kann vanliga roknast við í inngangandi meirvirðisgjald, eisini um virkið seinni fær keypsprísin heilt ella lutfalsliga afturgoldnan frá triðjamanni (t.d. í førum, tá ið arbeiði verður gjørt á fastari ogn, sum virkið nýtir, og tað eru aðrir - møguliga ikki skrásettir - sameigarar av ognini).

Keyp, ið heilt ella lutfalsliga viðvíkur meirvirðisgjaldsskyldugum virksemi hjá einum skrásettum fogarfelagi, kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald, hóast útreiðslan er fakturerað til ein ávísan fogara.

Meirvirðisgjald av fakturaðum frammanumdangjaldingum kann eisini roknast við í inngangandi meirvirðisgjald.

Um eitt virki riðar frammanundan til latara av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, og verður fyri tapi av tí, sum er goldið frammanundan, orsakað av at latarin kemur í fíggjartrot (konkurs), kann keypandi virkið rokna meirvirðisgjaldsupphæddina av tí, sum er goldið frammanundan, við í inngangandi meirvirðisgjald. Seinni reguléring av inngangandi meirvirðisgjaldi skal ikki gerast orsakað av tapinum.

Virki í gjaldsstoðgi og trotabúgv kunnu rokna meirvirðisgjald av advokatsamsýningum við uppgerð av inngangandi meirvirðisgjaldi við í inngangandi meirvirðisgjald eftir fylgjandi reglum:

Um trotabúgvið burturav hevur rikið meirvirðisgjaldsskyldugt virki, og tað við avtøkuna av búgvinum bæði eru aktiv, ið hava verið nýtt í meirvirðisgjaldsskyldaga virkinum, og privat aktiv, kann búgvið draga alt meirvirðisgjald av advokatútreiðslunum í samband við viðgerð av búgvinum frá sum inngangandi meirvirðisgjald.

Hevur trotabúgvið, áðrenn gjaldsstoðgmin ella fíggjartrotið byrjaði, bæði rikið meirvirðisgjaldsskyldugt og ikki meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi - og sostatt hevur havt lutfalsligan frádráttarrætt - kann frádráttarrættur veitast fyri meirvirðisgjald av advokatútreiðslum undir viðgerð av búgvinum við einum lutfalsligum parti, sum verður roknaður soleiðis:

- Í búgvi í gjaldsstoðgi verður tað frádráttarprosentið nýtt, sum hevur verið galdandi fyri virkið í tíðarskeiðinum beint áðrenn gjaldsstoðgin.
- Í trotabúgvi verður frádráttarprosentið sum meginregla roknað grundlað á munin millum sølu (ikki íroknað meirvirðisgjaldi av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum og samlaðu sølunni í fíggjartrotstíðarskeiðinum. Er eingin verulig søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í

fíggjartrotstíðarskeiðinum, verður tað frádráttarprosentið nýtt, sum hevur verið galdandi fyri virkið beint áðrenn gjaldssteðgin/fíggjartrotið.

Sostatt skal frádráttarrætturin fyri advokatsamsýning ikki á nakran hátt avmarkast, hóast privat aktiv eru við í avtøku av búgvinum. Sambært hesum er dentur lagdur á, at hesi aktiv eisini hava verið kreditgrundarlag fyri virkið, og at virðið á hesum aktivum vanliga eru av lítlum og ongum týdningi fyri búgvið og arbeiðið við avtøkuni. Aftrat hesum kemur, at galdandi reglur um neyðsynjarrætt (trangsbenificium) og ta praksis, ið verður nýtt í samband við avtøku av tílíkum búgvum, vanliga hava við sær, at privat aktiv, sum fallenturin eigur, ikki verða nortin av trotaviðgerðini.

Meirvirðisgjaldsskyldugt virki (persónur), sum uttan samband við fíggjartrot, gjaldssteðg ella tílíkt, hevur útreiðslur til advokat í samband við avtøku av heilt privatum aktivum, ið ikki viðvíkja meirvirðisgjaldsskylduga virkinum, t.d. privat innbúgv ella privat føst ogn, hevur harafturímóti ongan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av advokatútreiðslum, hóast avtøkan fer fram grundað á fíggjarligar trupulleikar í virkinum. Sama er galdandi, um útreiðslurnar eru í samband við onnur endamál, ið ikki hava frádráttarrætt.

Reglurnar kunnu nýtast samsvarandi til keyp av grannskoðanartænastur.

Sum meginregla eigur samsýning fyri umrøddu tænastur at verða býtt samsvarandi tí arbeiði, sum viðkomandi advokatur/grannskoðari hevur gjørt áðrenn ella aftaná at fíggjartrotið er komið (trotaúrskurður verður avsagdur (konkursdekretets afsigelse)).

Meirvirðisgjald av samsýning fyri tað arbeiði, sum annaðhvørt áðrenn ella aftaná, at fíggjartrotið er byrjað, er gjørt, kann sambært hesum roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá virkinum, og tollvaldið kann gera mótrokning yvir fyri búgvinum sambært vanligum reglum. Meirvirðisgjald av tí arbeiði, sum er gjørt, aftaná at fíggjartrot er byrjað, kann - sum fyri aðrar latingar til búgvið - roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá búgvinum, og tollvaldið kann gera mótrokning við møguligum hópkravi í búgvinum.

Reglurnar um frádráttarrætt fyri advokatútreiðslur í samband við viðgerð av trotabúgvi og búgvi í gjaldssteðgi verða á sama hátt nýttar í deyðsbúgvi, ið er skuldfrágongubúgv. Hetta stendst av, at viðgerð í tílíkum búgvum - eins og viðvíkjandi trotabúgvi og búgvi í gjaldssteðgi - fyrst og fremst miðar ímóti avtøku av aktivum v.m. í búgvinum, við tí fyri eyga at kreditorar fáa fulnað sambært meginreglum, ið eru galdandi fyri viðgerð av trotabúgvi, t. e. í samsvari við trotabúðarrøðina v.m.

Eitt deyðsbúgv, ið verður viðgjørt sum skuldviðtøkubúgv, og hvørs viðgerð tí fyrst og fremst miðar ímóti at býta tað, sum er eftir, millum arvingarnar, hevur frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av advokatútreiðslum sambært vanligum reglum í meirvirðisgjaldslógini.

Hvat vanligari advokatsamsýning fyri viðgerð av búgvi viðvíkur, kann búgvið rokna eitt nettan part av meirvirðisgjaldi av advokatútreiðslunum við í inngangandi meirvirðisgjald, treytað av, at samsýningin fevnir um útreiðslur av tænastum í sambond við avtøku av handilsaktivum, t.d. debitorar, rakstrarbygningar, maskinur, innbúgv v.m., og gjald av handilsskuld.

Viðvíkjandi serstakari advokatsamsýning fyri tænastur, ið full út kunnu vísast til avtøku av tílíkum aktivum og passivum, kann búgvið fult út rokna meirvirðisgjald av hesum við í inngangandi meirvirðisgjald.

Avmeldað virki, herímillum trota- og deyðsbúgv v.fl., kunnu sambært niðanfyri nevndu reglum fáa meirvirðisgjald av útreiðslum v.m. (t.d. advokat- ella grannskoðanartænastur), ið ikki áður er roknaður við í inngangandi meirvirðisgjald ella goldin aftaná av meldingina, endurgoldnan.

Fitt búgv verður ofta avmeldað frá skráseting sambært meirvirðisgjaldslógini, tá ið vørugoymsla og rakstrargøgnini eru seld og peningur fingin, meðan sjálv uppgerðin av búgvinum ofta kann draga út. Í øðrum førum kann talan vera um útreiðslur, sum annaðhvørt av tvísgáum ikki eru roknaðar við í inngangandi meirvirðisgjald í skrásetingartíðarskeiðinum, ella sum eru faktureraðar til viðkomandi virki aftaná at tað hevur avmeldað skrásetingina.

Hvat trotubúgvi v. m. viðvíkur er galdandi, at frádráttarrættur fyri advokatsamsýningar v. m. ikki er avmarkaður til tænastur í sambond við at selja og fáa pening (realisatión) av aktivum í búgvinum (skrásetingartíðarskeiðið), men eisini fevnir um tænastur, ið eru knýttar at t. d. ósemjum viðvíkjandi gjordum avtalum ella innkrevjing av kravum viðvíkjandi latingum, ið meirvirðisgjald er goldið fyri - eisini bóast hesar tænastur verða gjørdar aftaná, at búgvið er avmeldað frá skráseting.

Hetta merkir, at avmeldað búgv kunnu fáa endurgjald fyri meirvirðisgjald grundað á ta endaligu uppgerðina av advokat- og grannskoðarasamsýningum v. m., ið er gjørd, tá ið viðgerð av búgvinum er endað. Reglurnar eru eisini galdandi fyri búgv eftir skrásett virki, bóast búgvið ikki hevur verið skrásett (t. d. av tí at búgvið eingi aktiv hevði, hvørs sala (realisatión) hevði meirvirðisgjaldsskyldu við sær.

Onnur avmeldað virki kunnu eisini móti neyðugum rokniskaparligum skjalprógvi fáa heilt ella lutfalsligt endurgjald fyri meirvirðisgjald av útreiðslum v.m., ið standast av rokniskaparuppgerð/sundbuloting av virkinum, eisini um tænasturnar heilt ella lutfalsliga eru gjørdar aftaná, at virkið er avmeldað frá skráseting. Hetta er tó treytað av, at útreiðslurnar kunnu vísast til skrásetta partin av viðkomandi virki.

Ognarmeklarasamsýning v. m.

Meirvirðisgjald av skeytis- og meklarasamsýning í sambond við handil við vanu

lipari ogn, sum seljarin burturav hevur nýtt til raksturav skrásetingarskyldugum virksemi, kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald.

Viðvíkja samsýningarnar vinnuligari ogn, ið bæði hevur verið nýtt til meirvirðisgjaldsskyldugt og ikki meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi (blandað nýtsla), kann meirvirðisgjald av samsýningunum roknast við í inngangandi meirvirðisgjald við einum lutfalsligum parti, ið verður uppgjørdur samhæri reglunum um lutfalsligan frádráttarrætt.

Viðvíkja skeytis- og meklarasamsýningarnar ognum, ið hæddi hava verið nýttar til meirvirðisgjaldsskyldug og privat endamál, kann ein lutfalsligur partur av meirvirðisgjaldi av samsýningunum roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá seljaranum eftir einari meting. Um serstøk virðismeting av ognini er áseti fyri privata íbúð ella vinnuligu bygningarnar, kunnu ásettu virðismetingar vanliga leggjast til grundarlag við uppgerð av tí partinum av meirvirðisgjaldinum, sum verður mettur at viðkoma skrásetta virkinum.

Verða skeytis- og meklarasamsýningarnar heilt ella lutfalsliga goldnar av keypararnum, kann meirvirðisgjald av samsýningunum, samsvarandi omanfyri nevnda, roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá keypara í sambandi við eina óbroytta skrásetingarskylduga nýtslu av yvirtiknu ognini.

Meirvirðisgjald av stovningarútreiðslum v.m. av einum virki kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald í tann mun, útreiðslurnar viðvíkja sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, javnber § 16 í lógini.

Møguleiki er fyri frádrátti, hóast útreiðslurnar ikki beinleiðis standa í sambandi við sølu, tí roknast má við, at peningur altíð verður nýttur, tá ið eitt virki verður sett á stovn.

Bert í serligum førum, tá ið útreiðslurnar heilt ella lutfalsliga kunnu vísast til egin fíggjarlig mál/viðurskifti (privat fíggjarlig viðurskifti), ella tá ið einstakling ar gjalda ein part av útreiðslunum, kann frádráttarrættirin avmarkast.

Í hvørjum einstøkum føri má stoða tikast til, út frá eini fíokiligari meting, um ein partur av útreiðslunum kann vísast til egin mál.

Frádráttarrættirin kann harumframt avmarkast samhæri vanligu reglunum um lutfalsligan frádráttarrætt, um virkið hevur blandaða sølu frá meirvirðisgjaldsskyldugum/fríum aktivitetum.

Innheintingarmál

Frádráttarrættur fyri meirvirðisgjald av innheintingarsamsýning (inkassosalær) í innheintingarmálum kemur bara kreditorinum til góðar, við tað at advokaturin einans kann venda sínum krævi um samsyning (sidærkrav) móti kreditorinum (klientinum), sum tænastan varð gjørd fyri.

Er kreditorurin eitt skrásett virki, og krævið burturav viðvíkur latingum hjá virkinum av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, hevur virkið fullan

frádráttarrætt. Í hesum førum skal útreiðslan viðvíkjandi innheintingarsamsýning, sum advokaturin vegna kreditor setir fram ímóti debitori í einum innheintingarbrævi, gerast upp uttan meirvirðisgjald. Um so er, at debitor skuldi samsýna kreditori innheintingarsamsýning, íroknað meirvirðisgjald við frádráttarrætti, tá fær kreditor hesa meirvirðisgjaldsupphæddina.

Um kreditor ikki hevur frádráttarrætt, t. d. eitt ikki skrásett virki, kann meirvirðisgjald roknast við í útreiðslukravið móti debitori. Debitor hevur tó ikki frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald. Tað er loyvt advokati í omanfyri nevndu førum at tilskila tað meirvirðisgjald av innheintingarsamsýningum, sum er íroknað í útreiðslukravinum. Hetta er tó treytað av, at tað í viðmerking í brævinum stendur, at meirvirðisgjaldsupphæddin sambært tollvaldinum ikki kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá debitori.

Advokatar skulu í innheintingarmálum rokna meirvirðisgjald við eina og hvørja endaliga ella akonto debitering av innheintingarsamsýning hjá kreditori (klientinum), og við avrokning yvir fyri kreditori skal advokaturin fakturera innheintingartænastuna í samsvari við fakturaringsreglurnar.

Meirvirðisgjald viðvíkjandi keypi av aðalgimsteinum og aðalsteinum kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald,

> um so er at keyptu vørurnar skulu nýtast í samband við framleiðslu virkisins, ella
>
> – um so er at keyptu vørurnar eru ætlaðar at selja víðari. Hetta er tó treytað av, at virkið rekur veruliga vinnuligt virksemi við regluligum keypi og sølu av tílíkum vørum. Tá ið herta skal avgerast, verður dentur m.a. lagdur á, hvat slag virki er og onnur viðurskifti, herímillum eisini um roynt verður at selja viðkomandi vørur uttan mun til marknaðarprís, t.d. við at gera søluátiltøk (lýsingar v. m.).

Í øðrum førum kann frádráttarrættur ikki játtast, við tað at keypið ikki kann metast at viðvíkja meirvirðisgjaldsskyldugum virki, men má metast at vera gjørt við fløgu (investering) fyri eyga. Hetta er galdandi uttan mun til at aðalmetal v.m. verður keypt av og á. Meirvirðisgjald skal ikki gjaldast við sølu av aðalmetali v. m., sum frádráttarrættur ikki var fyri, tá ið tað varð keypt.

Í ávísum førum kann frádráttur játtast skrásettum virkjum fyri inngangandi meirvirðisgjald í samband við keyp av ektaðum teppum at nýta í hølunum á virkinum.

Frádráttarrætturin er vanliga treytaður av, at høltini á virkinum ikki standa í samband við egna íbúð. Høli, ið eru partur av íbúðini, kunnu ikki metast at verða høli virkisins. Hetta er galdandi, hóast høltini eisini verða nýtt til arbeiði hjá viðkomandi.

Tá ið metast skal, um frádráttarrættur kann játtast fyri keyp av ektaðum teppum, ella um keypið má metast at vera farið fram við investering fyri eyga, verður deutur lagdur á ommur viðurskifti hjá virkinum (vinnugrein. sala v. m.), herímillum um líkningarmiðjið hevur góðkent avskriving.

VIII. Roknskaparreglur

§ 17.

Fyri eina og hvørja lating av vørum ella avgjaldsskyldugum tænastum frá einum skrásettum virki skal fakturi útflýggjast móttakaranum. Verður krevt, at ein part ur av einari samlaðari lating verður goldin, áðrenn latingin er endað, skal serstakur fakturi útflýggjast fyri henda partin. Fakturin skal innihalda útflýggingardagfesting og upplýsing um navn og bústað hjá lataranum og hjá móttakaranum og slag, rúmd og prís á latingini. Haraumframt skal støddin á avgjaldsupphæddini vera tilskilað á fakturanum, ella tað skal vera skilligt, at avgjaldið er 16,67% av samlaða gjaldinum fyri avgjaldsskyldugu latingina. Latarin skal tilskila støddina á avgjaldsupphæddini á fakturanum, um so er, at móttakarin er eitt skráselt virki, ið biður um hetta. Latarin skal umframt hetta, eftir áheitan frá einum tílíkum móttakara, tilskila prísin, ikki frøknað avgjald, fyri teir einstøku postarnar á fakturanum.

2. stk. Fer alfursending av vørum fram, aftaná at fakturin er útflýggjaður, skal kreditnota útflýggjast. Sama er galdandi, um latarin, aftaná at fakturin er útflýggjaður, veitir frádrátt í prísinum á latingini, og avslátturin ikki er avslátur sambært § 7, 2. stk., punkt c. Fer eftirgjalding fram, skal ein eftirgjaldsfakturi útflýggjast.

3. stk. Skylda at útflýggja faktura verður nett sum lokin, tá móttakarin av avgjaldsskyldugu latingini gevur lataranum avrokningarskjal, sum lýkur tær treytir, ið eru ásettar í 1. stk. um fakturar.

4. stk. Tá eitt skrásett virki letur vørur ella avgjaldsskyldugar tænastur til eitt annað skrásett virki móti heilari ella partvís gjalding við vørum ella avgjaldsskyldugum tænastum (býtishandil), er tað nóg mikið, um annar av pørtunum útflýggjar faktura, um so er, at hann eisini inniheldur upplýsing um slag, rúmd og prís fyri tað, sum er móttikið í býtinum. Kunnu báðir partar til fulnar rokna avgjaldið av tí, teir hava móttikið, við í inngangandi avgjald, kann avgjaldið roknast grundað á munin millum gjøldini.

5. stk. Tvítøk av fakturum og kreditnotum og móttikin avrokningarskjøl skulu goymast av lataranum.

6. stk. Fevnir ein fakturi (avrokningarskjal) bæði um avgjaldsskyldugar og avgjaldsfrírar latingar, skal tað vera skilligt á fakturanum, hvørjar latingar eru avgjaldsskyldugar. Tílíkar latingar skulu tilskilast hvor sær við serstakari samanteljing.

7. stk. Sambært nærri reglum ásettar av landsstýrinum, kunnu frávik gerast í reglunum í 1. stk. um innihald á faktura viðvíkjandi flutningstænastu og sølu frá marknaðarsølu o. l.

8. stk. Við søla til privatar brúkarar er ikki neyðugt at útflýggja faktura sambært reglunum í 1. stk. Smásølur og onnur virki, hvørs søla einans fer fram til privatar brúkarar, kunnu eisini lata vera við at útflýggja faktura fyri aðra sølu, undantikið tá móttakarin er eitt skrásett virki, ið biður um faktura.

9. stk. Virki, ið ikki eru skrásett, mugu ikki tilskila avgjaldsupphæddina á faktura ella á annan hátt tilskila, at avgjald er roknað við í upphæddina á fakturanum. Móttekur eitt ikki skrásett virki eitt avrokningarskjal, har avgjaldsupphædd er tilskilað, ella har tað á annan hátt er tilskilað, at avrokningin er íroknað avgjald, skal virkið boða tí, sum hevur útflýggjað avrokningarskjalið, frá hesum og aftanrinda møguliga móttikna avgjaldið.

10. stk. Virki, sum móti 9. stk., 1. punktum, tilskila avgjaldsupphædd á einum faktura ella á annan hátt tilskila, at avgjald er roknað við í upphæddina á fakturanum, skulu gjalda avgjaldsupphæddina til landskassan. Sama er galdandi, um eitt skrásett virki á einum faktura tilskilar avgjald við ov stóruri upphædd ella á einum faktura fyri faringar, sum ikki eru avgjaldsskyldugar, tilskilar avgjaldsupphædd ella á annan hátt tilskilar, at avgjald er roknað við í upphæddina á fakturanum. Verður mistakið rættað yvir fyri keyparanum, er inngjalding tó ikki neyðug.

11. stk. Við prístilskilan fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur skal týðiliga gerast vart við, um avgjald sambært hesi lóg ikki er roknað við í prísin.

Til § 17, 1. stk.

Fakturi er bæði grundarlag undir uppgerð og eftirliti av útgangandi meirvirðisgjaldi hjá latara og skjalprógv fyri inngangandi meirvirðisgjald hjá móttakara.

Sambært roknskaparreglum, ið eru ásettar í §§ 17, 18 og 19, skal eitt og hvørt meirvirðisgjaldsskrásett virki føra roknskap yvir keyp og sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Roknskapurin er fyrst og fremst grundarlag fyri uppgerð av meirvirðisgjaldi hjá virkjum. Harumframt skal hann tryggja, at virkið kann lúka sína fráboðanarskyldu sambært § 29. At enda skal roknskapurin geva tollvaldinum møguleika at hava eftirlit við, at meirvirðisgjald verður rætt uppkravt og inngoldið.

Tá ið meirvirðisgjaldsskrásett virki lata vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, skulu tey altíð útflýggja móttakaranum faktura.

Ein fakturi sambært hesum reglum er at skilja sum eitt skjal, ið av lataranum og móttakaranum verður mett sum ein ábeitan um at gjalda.

Kvittanir, ið posthúsið útflýggjar fyri pakkaflutning, kunnu tó góðtakast sum prógv fyri inngangandi meirvirðisgjald, tá ið tær innihalda upplýsingar um portouppheddina.

Fakturi skal eisini útflýggjast, tá ið vørur/tænastur verða latnar, sum sambært meirvirðisgjaldslógini § 12 kunnu haldast uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu (útflutningssøla v.m.).

Verður kravt, at ein partur av einari samlaðari lating skal gjaldast, áðrenn alt er latið, skal serstakur fakturi útflýggjast fyri henda partin.

Tá ið vørur seinni verða aftursendar, ella tá ið prísavsláttur seinni verður givin, skal kreditnota útflýggjast, og við seinni eftirgjalding skal eftirgjaldsfakturi útflýggjast.

Sum meginregla skal fakturi altíð útflýggjast. Av praktiskum orsøkum viðvíkjandi smásølu kunnu frávik tó gerast, javnber § 17, 8. stk.

Tað er latarin, sum hevur skyldu at útflýggja faktura, men móttakarin kann lúka hesa skyldu við at geva lataranum avrokningarskjal.

Fakturar og avrokningarskjøl skulu útflýggjast, tá ið vøra/tænasta er latin ella skjótast aftaná hetta. Fakturering skal sostatt ikki fara fram seinni, enn vanliga innan vinnugreinina (t.d. fleiri vikur ella mánaðir).

Keypssáttmálar og keypsseðlar kunnu ikki góðtakast sum fakturar, uttan so at hesir lúka krøvini til fakturar sambært hesi lóg.

Fakturi skal útflýggjast í minsta lagi í 2 eintøkum og skal í minsta lagi innihalda upplýsingar um fylgjandi:

- dagfesting,
- navn og bústaður latarans,
- navn og bústaður móttakarans,
- slag og nøgd (mongd) á tí, ið latið verður,
- prísur fyri tað, ið latið verður,
- áseting/fráboðan um meirvirðisgjald.

Á báðum eintøkunum av fakturanum skal framhaldandi nummar standa. Tað er ikki kravt, at nummarið skal vera forprentað á oyðibløðunum. Sostatt er nóg mikið, um nummarið verður ásett, tá ið útflýggjað verður.

Dagfestingin skal vera tann dagurin, tá ið fakturin er skrivaður út. Tað er t. d. ikki loyvt, at "afturdagfesta" fakturan til tann dagin, tá ið latið var .

Meirvirðisgjald kann á fakturanum annaðhvørt tilskilast við støddini á meirvirðisgjaldsupphæddini ella við satsinum 16,67% av samlaðu upphæddini fyri latingina.

Tó skal latarin, tá ið meirvirðisgjaldsskrásettur móttakari biður um tað, tilskila støddina á meirvirðisgjaldsupphæddini á fakturanum.

Latarin skal somuleiðis eftir áheitan frá skrásettum móttakara tilskila prísin, ikki íroknað meirvirðisgjald, fyri tær einstøku vørurnar ("postarnar") á fakturanum.

Verður goldið partvíst ella fult fyri eina lating, áðrenn latið verður, áðrenn alt er latið ella áðrenn fakturi er útflýggjaður, skal hesin peningur roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu sølu fyri tað tíðarskeiðið, tá ið peningurin varð móttikin.

Verður áheitan um útgjalding av ratupeningi, akontopeningi ella tílíkum gjørd sum ein fakturi, skal meirvirðisgjald roknast av peninginum, tá ið fakturin verður útflýggjaður. Ein akontoáheitan má sostatt ikki innihalda upplýsing um meirvirðisgjaldsrokning v. m., um so er, at virkið ikki ætlar at rokna upphæddina við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, fyrr enn peningurin er móttikin.

Verður áheitan um gjalding av ratupeningi ella tílíkum ikki gjørd sum ein fakturi, skal útflýggjast serstakur fakturi, aftaná at peningurin er fingin, um móttakarin ikki er ein privatur brúkari.

Til § 17, 2. stk.

Tá ið vørur verða sendar aftur, ella avsláttur verður givin í prísinum, aftaná at fakturi er útflýggjaður, skal kreditnota útflýggjast. Sama er galdandi, um avsláttur verður veittur, sum kann dragast frá, tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla verður uppgjørd.

Í føroun har eftirgjalding fer fram orsakað av hækking í prísinum ella sum liður í serligari latingaravtalu, aftaná at fakturi er útflýggjaður, skal eftirgjaldsfakturi útflýggjast.

Kreditnotur og eftirgjaldsfakturar skulu innihalda somu upplýsingar sum fakturar annars.

Til § 17, 3. stk.

Ikki er neyðugt at útflýggja faktura, um móttakarin útflýggjar avrokningarskjal, sum lýkur somu krøv, sum eru galdandi fyri fakturar.

Avrokningarskjalið skal sostatt vera útflýggjað í minsta lagi í 2 eintøkum, hava framhaldandi nummar og innihalda tær upplýsingar, ið eru kravdar viðvíkjandi fakturum.

Annars eru reglur viðvíkjandi útflýggjan og innihaldi v. m. tær somu fyri avrokningarskjøl sum fyri fakturar. Avrokningarskjal við meirvirðisgjaldi má bert útflýggjast, um seljarin er eitt skrásett virki. Tá ið meirvirðisgjald verður útgoldið, eigur keyparin at tryggja sær, at seljarin er meirvirðisgjaldsskrásettur, og at krevja kvittan fyri, at hann hevur fingið peningin.

Ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki kunnu eisini útflýggja avrokningarskjøl.

Tað er latarin, sum hevur ábyrgdina fyri, at fakturi verður útflýggjaður, og sostatt er hann bert frítikin fyri at útflýggja faktura, um so er, at móttakarin útflýggjar eitt rætt avrokningarskjal.

Til § 17, 4. stk.

Býtishandil er, tá ið gjald fyri latnar vørur og tænastur annaðhvørt fyri ein part ella fult út eru aðrar vørur ella tænastur.

Eru báðir partar í einum býtishandli meirvirðisgjaldsskrásett virki, er nóg mikið, um annar parturin útflýggjar faktura, um fakturin inniheldur upplýsing um slag, nøgd, mongd og prís fyri tað, ið er fingið í býti. Fakturin virkar her sostatt bæði sum fakturi og sum avrokningarskjal.

Hava báðir partar fullan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av móttiknum vørum ella tænastum, kann meirvirðisgjald roknast grundað á munin. Sostatt er nógmikið, um tað sæst á fakturanum, at meirvirðisgjaldið er 16,67% av muninum.

Um býtishandil annars verður víst til viðmerkingarnar til § 8, 2. stk.

Til § 17, 5. stk.

Avrit av fakturum og kreditnotum og móttikin avrokningarskjøl skulu goymast av lataranum.

Á virkjum, sum nýta edv-skipan, kunnu samlað yvirlit við upplýsingum um innihaldið á hvørjum einstøkum faktura góðtakast í staðin fyri avrit av faktura.

Tollvaldið kann góðkenna, at skrásett virki goyma avrit av fakturum sum mikrofilm, um so er, at arkivskipanin hjá viðkomandi virkið annars er soleiðis tilrættiløgd, at tollvaldið fær gjørt eftirlit.

Til § 17, 6. stk.

Fevnir ein fakturi bæði um meirvirðisgjaldsskyldugar og meirvirðisgjaldsfrírar latingar, skal kunna síggjast á fakturanum, hvørjar latingar eru meirvirðisgjaldsskyldugar. Latingarnar skulu tilskilast hvør sær við serstakari samanteljing.

Harafturímóti er einki krav um, at fakturi viðvíkjandi latingum, ið bæði fevna um tilfar og arbeiðstænastur, serstakt skal tilskila upphædd fyri tilfar og arbeiðsløn, tá ið fakturin annars inniheldur neyðugar upplýsingar um slag og nøgd á lating.

Til § 17, 7. stk.

Sambært nærri reglum, ið verða ásettar av landsstýrinum, kunnu frávik gerast í reglum um innihald á faktura fyri flutningstænastu og fyri sølu frá sjálvtøkugoymslu, marknaðarsølu o. t.

Til § 17, 8. stk.

Tá ið selt verður til privatar brúkarar, er ikki neyðugt at útflýggja faktura. Hendan regla er galdandi fyri øll virki.

Smásølur og onnur virki, sum selja meginpartin til privatar brúkarar, kunnu eisini lata vera at útflýggja faktura fyri sølu til onnur enn privatar brúkarar. Av tí

at inngangandi avgjald sambært § 15, 4. stk. er tað avgjaldið, sum í tíðarskeiðinum er fakturerað til eitt virki av lataranum, kunnu meirvirðisgjaldsskrásettir keyparar tó altíð krevja, at fakturi verður útflýggjaður.

Verður fakturi, nota ella tílíkt kortini útflýggjað, tá ið selt verður til privatar brúkarar v. fl., er ikki neyðugt at lúka krøv til fakturar í meirvirðisgjaldslógini.

Til § 17, 9. og 10. stk.

Virki, ið ikki eru meirvirðisgjaldsskrásett, mugu ikki tilskila meirvirðisgjaldsupphædd ella á annan hátt viðmerkja á faktura, at upphæddin á fakturanum er íroknað meirvirðisgjald.

Ætlanin við hesi reglu er at forða fyri, at tílík virki av órættum krevja meirvirðisgjald, sum ikki verður avroknað við tað almenna, og at skrásettir keyparar hjá tílíkum virkjum fáa grundarlag fyri frádrátti fyri inngangandi meirvirðisgjald, sum teir ongan rætt hava til.

Um meirvirðisgjald verður uppkravt, ella um eitt skrásett virki hevur uppkravt meirvirðisgjald við ov stórari upphædd ella tilskilað meirvirðisgjald á einum faktura yvir meirvirðisgjaldsfríar latingar, skal meirvirðisgjaldsupphæddin, ið av órættum er uppkravd, gjaldast landskassanum.

Tó slepst undan innjalding, um mistakið verður rættað yvir fyri keyparanum á tann hátt, at upprunaligi fakturin verður tikin aftur og ein rættur fakturi sendur ístaðin, ella á lann hátt, at kreditnota verður útflýggjað, sum rættar mistakið.

Tollvaldið kann sambært hesum reglum ikki áleggja einum latara at útflýggja kreditnotu viðvíkjandi meirvirðisgjaldi, ið er kravt av órættum. Reglurnar geva bert pørtunum møguleika fyri at avgera viðurskiftini sínámillum. Hendir hetta ikki, má latarin gjalda landskassanum peningin.

Reglurnar kunnu nýtast í førum, har bilsølur v. fl. í stríði við regluna í § 10, 3. stk. tilskila meirvirðisgjaldsupphædd ella á annan hátt tilskila eina upphædd, sum meirvirðisgjald kann roknast út eftir, á sølufaktura.

Reglurnar kunnu hareftirímóti ikki nýtast í førum, har meirvirðisgjald í stríði við reglurnar í § 12, 5. stk. er roknað, tá ið vørugoymsla, maskinur og onnur rakstrargøgn hava verið avhend. Í tílíkum førum hevur keyparin ikki loyvi at draga frá inngangandi meirvirðisgjald, og seljarin skal tí rætta mistakið yvir fyri keyparanum á tann hátt, at kreditnota verður útflýggjað keyparanum áljóðandi meirvirðisgjaldsupphæddina, samstundis sum roknaða meirvirðisgjaldsupphæddin verður afturgoldin.

Reglurnar kunnu harumframt bæði takast í nýtslu yvir fyri virkjum og yvir fyri einstaklingum, ið ikki eru skrásetlir fyri sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Fær eitt ikki skrásett virki avrokningarskjal, sum meirvirðisgjaldsupphædd er tilskilað á, ella tað á annan hátt er tilskilað, at avrokningin er íroknað meirvirðis-

gjald, skal virkið boða honum, sum hevur útflýggjað avrokningarskjalið, frá hesum og afturgjalda meirvirðisgjaldið.

Verður meirvirðisgjald goldið einum seljara, ið hevur upplýst, at hann er meirvirðisgjaldsskrásettur, og tað aftaná vísir seg, at hesin hvørki er skrásettur ella skrásetingarskyldugur, skal seljarin afturgjalda keyparanum ella gjalda tollvaldinum móttiknan meirvirðisgjaldspening.

Royndir frá øðrum londum vísa, at í summum førum, har rokning og útgjalding av meirvirðisgjaldi til ikki-skrásettar seljarar er framd, hava hesir seinni nok tað at kenna nakað til viðkomandi latingar. Fyri ikki at koma í tílíka støðu eigur keyparin at krevja, at latarin kvittar á avrokningarskjalið, at hann hevur fingið peningin.

Til § 17, 11. stk.

Tá ið prísur fyri vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verður tilskilaður, skal tað viðmerkjast týðiliga, um prísurin ikki er íroknaður meirvirðisgjald. Hetta er galdandi fyri prísskelti, prístilboð, lýsingar, sáttmálar o. t. Reglan fevnir eisini um munnlig tilboð.

Reglan skal tryggja, at keyparin ikki kemur í ta støðu, at hann skal gjalda meirvirðisgjald, sum hann helt vera roknað við í prísinum.

§ 18.

Skrásett virki skulu føra roknskap yvir keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum kann vera grundarlag fyri uppgerð av avgjaldsskylduni fyri hvørt avgjaldstíðarskeið og fyri eftirlitið við rættari greiðslu av avgjaldinum.

2. stk. Roknskapurin skal innihalda serstøk konti, sum vísa støddina á inngangandi og útgangandi avgjaldinum. Avgjaldskontiini kunnu førast við tíðarposteringum, um avgjaldsupphæddirnar beinleiðis kunnu roknast grundað á roknskapskontiini yvir keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

3. stk. Virki, ið ikki føra vanligar handilsbøkur, ella hvørs handilsbøkur ikki verða førdar samsvarandi 1. og 2. stk., skulu føra roknskap í einum serligum roknskaparhetti, sum verður útflýggjað av Toll- og Skattstovu Føroya.

4. stk. Til skjals fyri inngangandi avgjaldið skulu skrásett virki kunna leggja fram fakturar (avrokningarskjøl), ið lúka tær treytir, ið eru nevndar í § 17, 1. stk. javnber 4. og 7. stk., ella fráboðanir frá Toll- og Skattstovu Føroya um støddina á tí avgjaldi, ið sambært § 27 er álagt vørum, sum virki hevur innflutt úr útlondum. Fakturar, upp á hægst 200 kr., ið eru útgivnir av smásølum ella øðrum virkjum, hvørs søla einans fer fram til privatar brúkarar, kunnu leggjast fram sum skjalprógv, hóast fakturarnir ikki innihalda upplýsingar um navn og bústað hjá móttakaranum.

5. stk. Landsstýrið ásetir nærri reglur viðvíkjandi roknskaparførslu hjá skrásettum virkjum.

Til § 18

Landsstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk, sum í løtuni arbeiðir við at gera nýggjar roknskaparreglur.

Hetta arbeiði verður væntandi liðugt á sumri í ár og eigur at vera tikið við, tá ið krøv skulu setast viðvíkjandi roknskapi hjá meirvirðisgjaldsskrásettum virkjum.

Hetta kann t. d. gerast í kunngerð, ið verður gjørd við heimild í § 18, 5. stk.

Krøvini til roknskap verða tó í minsta lagi sum ásett í § 18.

Sambært § 18 skulu skrásett virki føra roknskap yvir keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum kann vera grundarlag fyri uppgerðini av avgjaldstilsvarinum fyri hvørt avgjaldstíðarskeið og fyri eftirlitinum við, at avgjaldið verður rætt goldið.

Roknskapurin skal innihalda serlig konti, ið vísa støddina á inngangandi og útgangandi avgjaldi. Avgjaldskontiini kunnu tó førast við tíðarposteringum, um so er, at tað ber til beinleiðis at rokna avgjaldsupphæddirnar eftir bókingum av keypi og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum í roknskapinum (§ 18, 2. stk.).

Roknskapurin verður vanliga skipaður sum ein partur av vanliga handilsroknskapinum. Kann handilsroknskapurin ikki vera grundarlag undir avgjaldsroknskapinum, ella bókar eitt virki ikki í vanligar handilsbøkur, skal avgjaldsroknskapurin verða førdur í eitt serligt roknskaparhefti, sum tollvaldið útflýggjar (§ 18, 3. stk.).

Um virki føra vanligan handilsroknskap, kunnu tey eisini vanliga nýta hann til at uppgera avgjaldið, og í flestu førum kann hann eisini nýtast til avgjaldseftirlit. Sambært § 18, 5. stk. verða nærri reglur um roknskaparførslu v.m. í samsvari við meirvirðisgjaldslógina ásettar í kunngerð.

Virki, ið eru skrásett sambært meirvirðisgjaldslógini, skulu sambært nærri reglum, ið verða ásettar í kunngerð, bóka keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, soleiðis at tær upphæddir, sum virkið við endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði skal geva upp í avgjaldsuppgerðini til tollvaldið, síggjast í roknskapinum.

Roknskapurin skal vera týðiligur og greiður og innihalda sundurliðingar, sum gera tað møguligt hjá tollvaldinum at kanna, um avgjaldið verður rætt goldið. Verða keyp og søla bókað sum ein samlað upphædd, skulu skjøl fylgja við (t. d. journalir, kladdur, kassastrimlar ella tílíkt), sum sundurliða samlaðu upphæddina í einstakar upphæddir.

Roknskapurin skal vera soleiðis skipaður, at tollvaldið kann samanbera bókingarnar í roknskapinum við keyps- og søluskjøl.

Roknskapurin skal eisini innihalda sovorðnar upplýsingar, at virkið kann lúka sína skyldu eftir áheitan at geva tollvaldinum upplýsingar um keyp av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum hjá teimum einstøku virkjunum (latarunum) og um latnar vørur og avgjaldsskyldugar tænastur til tey einstøku virkini (viðskiftafólkið).

Vanligur handilsroknskapur skal innihalda hesi serligu konti:

1. Konto fyri inngangandi avgjald (avgjald av keypi)
2. Konto fyri útgangandi avgjald (avgjald av sølu), og møguliga
3. Konto fyri útflutning v. m.

Á konto fyri inngangandi avgjald skal avgjald á keypi av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum bókast til virkið at nýta, í tann mun avgjald á keypi kann roknast við í inngangandi avgjald.

Á konto fyri útgangandi avgjald skal avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum virkið selur ella tekur út til nýtslu hjá handhavara, starvsfólki, til umboðan v. m., bókast.

Konto fyri útflutning v. m. verður stovnað av virkjum, sum hava útflutning ella aðra sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum avgjald ikki skal rindast fyri. Á hesa konto verður søluprísurin fyri latnar vørur/tænastur bókaður.

Tey einstøku skjølini yvir keyp og sølu skulu bókast í handilsroknskapinum (journalir, kladdur v. m.), og avgjaldskonti skulu sum meginregla førast við reglubundnum bókingum, soleiðis at roknskapurin vísir støddina á inngangandi og útgangandi avgjaldinum.

Avgjald, ið verður roknað av og inngoldið tollvaldinum við møguligan innflutning, sum virkið hevur av vørum, skal altíð bókast beinleiðis á konto fyri inngangandi avgjald.

Avgjaldskontiini skulu gerast upp við endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði. Samlaða inngangandi avgjaldið (saldo á konto fyri inngangandi avgjald) verður flutt á konto fyri útgangandi avgjald, ið sostatt vísir ta avgjaldsupphædd, ið skal inngjaldast tollvaldinum (møguliga skal afturgjaldast av tollvaldinum). Við inngjalding til (útgjalding frá) tollvaldið, verður goldna (afturgoldna) upphæddin flutt á konto fyri útgangandi avgjald, ið sostatt er álíknað.

Í kunngerð um roknskap verða ásettar reglur fyri kassaroknskap hjá skrásettum virkjum, um edv-bókhald og um skyldu at goyma roknskapartilfarið.

At enda verður ásett í kunngerðini, at avgjaldsroknskapur fyri eitt avgjaldstíðarskeið skal vera førdur, innan avgjaldsuppgerðin verður latin tollvaldinum.

§ 19.

Skrásett virki og virki, ið sambært § 4, 1. stk. eru frítikin frá avgjaldsskyldu, skulu goyma roknskapartilfarið, herímillum fakturar, fakturatvítøk og kassastrimlar v.m., viðvíkjandi keypi og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum 5 ár eftir endan á roknskaparárinum.

2. stk. Skrásett virki skulu einaferð um árið grundað á eina uppteljing av vørugoymsluni hjá virkinum gera uppgerð yvir virðið á goymsluni. Uppgerðin skal goymast 5 ár eftir endan á roknskaparárinum.

Til § 19

Meirvirðisgjaldsskrásett virki og virki, ið sambært meirvirðisgjaldslógini § 4, 1. stk. eru frítikin frá at gjalda meirvirðisgjald (virki við einari sølu, sum ikki fer upp um 20.000 kr. árliga), skulu goyma handilsroknskap (herímillum vørukeyps- og vørusølubøkur, sølukladdur, kontokort, journalir v. m.) og roknskaparskjøl og annað roknskapartilfar (herímillum bíleggingarbøkur), keypsfakturar, avrokningarskjøl, avrit av sølufakturum, kreditnotur, rokningar, notur, fremleiðsluskjøl, kassastrimlar, yvirlit yvir goymsluuppteljing o. t.) 5 ár aftan á viðkomandi roknskaparárslok.

Skylda at goyma er galdandi, hóast virkið fer úr skráseting.

Sambært 2. stk. skulu skrásett virki einaferð um árið gera eina uppteljing av vørugoymsluni. Virkini avgera sjálv, nær henda uppteljing fer fram.

IX. Avrokning av avgjaldinum

§ 20.

Skrásett virki skulu seinast 25 dagar aftaná hvørt avgjaldstíðarskeið fráboða Toll- og Skattstovu Føroya støddina á útgangandi og ingangandi avgjaldi í tíðarskeiðinum og støddina á sølu, sum sambært § 12, 1-4 stk., ikki skal roknast við í avgjaldsskylduga sølu. Upphæddirnar skulu tilskilast í heilum krónum, við tað at oyru ikki verða tald við. Uppgerðin, sum skal vera undirskrivað av ábyrgdarleiðsluni á virkinum, skal skrivast á eitt serligt oyðiblað, sum eisini verður nýtt, tá avgjaldið verður inngoldið.

2. stk. Avgjaldstíðarskeiðini eru 4 um árið: januar, februar og mars, apríl, mai og juni, juli, august og september og oktober, november og desember.

3. stk. Virkir, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, kunnu fáa loyvi at avrokna einaferð um vikuna. Avgjaldstíðarskeiðið kann bert broytast solciðis, at hetta fer fram í byrjanini av avgjaldstíðarskeiðinum sambært 2. stk. Søkjast skal um hetta loyvi ein mánað frammanundan. Verður loyvið játtað virkjum sambært 3. stk., kunnu virkini ikki nýta avgjaldstíðarskeið sambært 2. stk. tey næstu 2 árini frá tí, at loyvið er játtað.

Til § 20

Skrásett virki skulu avrokna avgjaldið fyri hvørt avgjaldstíðarskeið grundað á uppgerð, sum virkið hevur gjørt.

Í § 20, 1. stk. í lógini er ásett, at virki eftir lokið avgjaldstíðarskeið skulu boða tollvaldinum frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldi hjá virkinum í tíðarskeiðinum og støddini á tí sølu (§ 12, 1-3 stk.), ið ikki skal roknast við í avgjaldsskylduga sølu, t.e. útflutningur og søla av skipi/flogfari og tíðindabløðum.

Avgjaldstíðarskeiðini eru 6 um árið og fevna um januar - februar, mars - aprfl, mai - juni, juli - august, september - oktober, og november - desember.

Fyri hvørt avgjaldstíðarskeið skulu virki lata inn uppgerð á oyðiblaði, sum tollvaldið sendir virkjunum.

Virki skulu eisini lata inn uppgerð fyri tíðarskeið, sjálvt um tey ikki hava havt inngangandi ella útgangandi avgjald.

Fyri virkini er uppgerðin eitt inngjaldingarkort, ið samstundis kann nýtast at gjalda avgjaldið.

Upplýsingarnar til uppgerðina verða givnar á baksíðuna á inngjaldingarkortinum. Er avgjaldið null ella negativt, skal oyðiblaðið kortini sendast sum uppgerð.

Uppgerðin skal vera tollvaldinum í hendi í seinasta lagi 25 dagar eftir endan á avgjaldstíðarskeiðinum, og skal vera undirskrivað av ábyrgdarhavandi leiðslu á virkinum.

§ 21.

Um uppgerð fyri eitt avgjaldstíðarskeið ikki verður innlatin til ásetta tíð, verður avgjaldið fyri viðkomandi avgjaldstíðarskeið hækkað við 1%, tó í minsta lagi við 300 kr. og í hægsta lagi við 1.000 kr.

2. stk. Toll- og Skattstova Føroya kann fráboða frítøku fyri hækking av avgjaldi sambært 1. stk, tá tað av serligum orsøkum verður hildið at vera rímiligt.

3. stk. Hevur Toll- og Skattstova Føroya aftaná lokna innlatingarfreist ikki móttikið uppgerð fyri eitt avgjaldstíðarskeið, kann Toll- og Skattstova Føroya fyribils áseta avgjald hjá virkinum út frá einari meting.

Til § 21

Er uppgerð fyri eitt avgjaldstíðarskeið ikki latin rættstundis inn, verður avgjaldið hjá virkinum fyri viðkomandi avgjaldstíðarskeið hækkað við 1%, tó minst við 300 kr. og hægst við 400 kr. (§ 21, 1. stk.).

Henda regla hevur sum endamál at fáa virki at lata uppgerðina inn rættstundis. Hetta er av stórum týdningi fyri fyrisitingina við eini avgjaldslóg við so nógvum skrásettum virkjum.

Eitt serligt giroinngjaldingarkort verður sent virkjum til at gjalda inn avgjaldshækkingina.

Eru serligar orsøkir til, at uppgerðin ikki er latin inn rættstundis, kann frítøka fáast fyri at gjalda avgjaldshækkingina.

Hevur tollvaldið eftir loknað innlatingarfreist ikki fingið uppgerðina fyri eitt avgjaldstíðarskeið, kann tollvaldið gera eina fyribils meting av avgjaldinum hjá virkinum fyri umrødda tíðarskeið til eina ásetta upphædd (§ 21, 3. stk.).

Henda regla hevur til endamáls at skunda undir innlating av uppgerðini og at fáa grundarlag fyri innheinting (panting). Virkini kunnu bert sleppa sær undan fyribils meting við at lata inn uppgerðina.

Virki, ið ikki lata rættstundis inn, koma eisini undir sektarábyrgd.

§ 22.

Avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið fellur til gjaldingar og skal inngjaldast í seinasta lagi 25 dagar aftan á endan á avgjaldstíðarskeiðinum.

2. stk. Verður avgjaldið ikki goldið til tíðina, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsdegnum at rokna, tó í minsta lagi 100 kr. fyri eitt avgjaldstíðarskeið. Renta verður ikki goldin av einari hækking sambært § 21, 1. stk. av avgjaldinum.

Til § 22

Avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið fellur til gjaldingar og skal vera goldið í seinasta lagi 25. í mánaðinum aftaná, at avgjaldstíðarskeiðið er endað.

Hevur eitt virki ikki goldið avgjaldið rættstundis, skal tað gjalda 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánaða frá gjaldkomudegnum at rokna, tó minst 100 kr. fyri eitt avgjaldstíðarskeið (§ 22, 2. stk.).

Renta skal ikki gjaldast av avgjaldshækking, sum stendst av ov seint innlatnari uppgerð.

Rentan verður uppkravd á tann hátt, at eitt serligt giroinngjaldingarkort verður sent virkinum.

Eingin frítøka fæst fyri at gjalda rentu.

Føroya Gjaldstova kemur at umsita innkrevjingar av eftirstøðum sambært mærvirðisgjaldslógini.

§ 23.

Viðvíkjandi virkjum, sum bert skulu rekast í styttri tíð, kann Toll- og Skattstova Føroya áseta, at avgjaldstíðarskeiðið, er tað tíðarskeiðið, sum virkið skal rekast í. Toll- og Skattstova Føroya kann harumframt stytta freistirnar fyri at senda inn uppgerð og gjalda avgjald hjá tílíkum virkjum.

2. stk. Hevur eitt virki fleiri ferðir ikki inngoldið avgjald rættstundis, kann Toll- og Skattstova Føroya stytta avgjaldstíðarskeiðið hjá virkinum og freistina fyri at

senda inn uppgerð og gjalding av avgjaldi. Sama er galdandi, um handhavarin á einum virki við útinning er mettur ikki at vera førur fyri at gjalda skuldina, um handhavarin hevur steðgað síni gjalding ella er undir sjálvbodnari skuldsemju ella í avtøku, ella um virkið er eitt partafelag, og hetta er í avtøku sambært reglunum um ógjaldfør vinnufeløg. Hetta er somuleiðis galdandi fyri virki, um búgv handhavarans er undir fíggjartrotsviðgerð ella undir neyðskuldsemjusamráðingum, ella um deysbúgv handhavarans verður viðgjørt sambært kapittul III í lóg um skifti av deysbúgvi og felagsbúgvi.

Til § 23

Fyri virki, ið bert verða rikin eitt stutt tíðarskeið, kann tollvaldið áseta, at avgjaldstíðarskeiðið er tað tíðarskeiðið, sum virkið verður rikið í. Harumframt kann tollvaldið stytta innlatingarfreist fyri uppgerð og gjaldsfreist fyri avgjald hjá tílíkum virkjum.

Hesar reglur eru millum annað at nýta til avgjaldsskyldug virki, ið bert verða rikin viðhvørt, t. d. konsertir, almennar veitslur ella servering í serligum førum (veitslur, fundir, marknaður, fyribils framsýningar o. t.), og í førum tá ið væntast kann, at avgjald, ið eigur at verða goldið, ikki verður goldið.

Eitt serligt oyðiblað verður gjørt til uppgerðina, og hon skal altíð latast inn áðrenn 25 dagar aftaná, at avgjaldsskylduga virkið er hildið uppat.

Hevur eitt virki fleiri ferðir ikki goldið avgjald rættstundis, kann tollvaldið stytta avgjaldstíðarskeiðið, innlatingarfreistina og gjaldsfreistina hjá virkinum, sambært 2. stk.

Sama er galdandi, um handhavari á einum virki við útinning (eksekutión) er mettur ikki at kunna gjalda sína skuld, um handhavari hevur steðgað gjaldingunum ella er undir sjálvbodnari skuldsemju (akkord) ella í avtøku (likvidatión), ella um virkið er eitt partafelag, og hetta er í avtøku sambært reglum um feløg í gjaldtroti. Hetta er somuleiðis galdandi, um búgv handhavarans er undir viðgerð fyri fíggjartrot (konkursbehandling) ella undir samráðingum um neyðskuldarsemju (tvangsakkordforhandling), ella um deyðsbúgv handhavarans verður viðgjørt sambært kap. III í lóg um skifti av deyðshúgvi og felagsbúgvi.

Reglan er ætlað at avmarka kredittin hjá virkjum, sum fleiri ferðir ikki hava goldið avgjaldið, fyrrenn aftan á at tey hava fingið rykkjarar.

Kreditturin verður avmarkaður á tann hátt, at avgjaldstíðarskeiðið verður stytt til 1 mánað, og innlatingarfreistin fyri uppgerðina og gjaldsfreistin fyri avgjaldið verða ásettar til 10 dagar.

Um seinasti rætti inngjaldingardagur er leygardagur, sunnudagur ella halgidagur, er næsti komandi gerandisdagur roknaður at vera seinasti rætti inngjaldingardagur.

Goldið er rættstundis, um:

- upphæddin verður goldin postverkinum seinasta rætta inngjaldingardag, ella
- áheitan um flyting frá postgirokonto virkisins er postgirostovuni í hendi áðrenn dagin eftir seinasta rætta inngjaldingardag, ella
- ein kekkur áljóðandi upphæddina kemur tollvaldinum í hendi við fyrstu postbering dagin eftir seinasta rætta inngjaldingardag.

§ 24.

Er inngangandi avgjaldið hjá einum virki fyri eitt avgjaldstíðarskeið størri enn útgangandi avgjaldið, verður avgjaldsyvirskotið útgoldið virkinum.

2. stk. Er uppgerðin rættstundis móttikin, fer útgjalding sambært 1. stk. fram, í seinasta lagi 3 vikur eftir at avgjaldsuppgerðin fyri viðkomandi tíðarskeið er móttikin. Kann Toll- og Skatstova Føroya vegna viðurskiftini hjá virkinum ikki hava eftirlit við uppgerðini, verður útgjaldingarfreistin avbrotin, til viðurskiftini hjá virkinum ikki longur forða eftirliti.

3. stk. Útgjalding fer bert fram, um avgjaldsuppgerð viðvíkjandi undanfarnum avgjaldstíðarskeiðum er móttikin. Krav um avgjald (og møguligar rentur) fyri hesi tíðarskeið verða mótroknað við útgjalding, hóast avgjaldskravið ikki er fallið til gjaldingar.

Til § 24

Tá ið inngangandi avgjaldið hjá einum virki í einum avgjaldstíðarskeiði er størri enn útgangandi avgjaldið, t. d. orsakað av stórum íløgukeypi, verður munurin útgoldin virkinum.

Er uppgerðin rættstundis í hendi (og rætt fylt út), skal útgjalding fara fram í seinasta lagi 3 vikur aftaná, at avgjaldsuppgerðin fyri umrødda avgjaldstíðarskeið er í hendi. Um tollvaldið, orsakað av viðurskiftum á virkinum (t. d. ferju, burturferð v. m.), ikki hevur lingið kannað uppgerðina, verður steðgur í útgjaldingarfreistini, til viðurskiftini á virkinum ikki longur forða eftirliti.

Afturgjaldingin er tó treytað av, at avgjaldsuppgerðir viðvíkjandi undanfarnum avgjaldstíðarskeiðum eru tollvaldinum í hendi. Avgjøld og rentur fyri hesi tíðarskeið, ið ikki eru goldin, verða mótroknað við útgjaldingina.

Skyldar eitt virki landskassanum annan pening, t. d. toll, avgjald á framleiðslu og innflutningi ella skatt, kann tílík skuld eisini mótroknast í negativa avgjaldinum.

Viðmerkjast skal her, at víðka heimild er til mótrokning í hesum føri, av tí at mótroknast kann, hóast avgjaldskravið ikki er fallið til gjaldingar.

§ 25.

Fyri gjalding av avgjaldi sambært hesi lóg ábyrgdast tann, ið sum ánari, uppsitari ella tílíkt rekur virkið fyri egna rokning. Eru fleiri virki, ið ikki hava sama ánara, skrásett undir einum, sbr. § 5, 3. stk., bera viðkomandi samábyrgd fyri gjalding av avgjaldi viðvíkjandi teimum virkjum, ið eru umfevnd av felags skrásetingini. Er eitt útlendskt virki skrásett við einum umboði her á landi sambært § 5, 1. stk, 3. pkt., bera hesin og virkið samábyrgd fyri gjalding av avgjaldinum.

Til § 25

Tann, ið sum eigari, uppsitari ella tílíkt rekur virki fyri egna rokning, ábyrgdast fyri, at avgjaldið verður goldið.

Eru fleiri virki, ið ikki hava sama eigara, skrásett undir einum (felagsskráset ing), hava tey samábyrgd fyri at avgjald viðvíkjandi virkjunum, ið eru umfatað av felagsskrásetingini, verður goldið.

Er útlendskt virki skrásett við umboðsmanni, ið er her á landi, hava hesin og virkið samábyrgd fyri, at avgjaldið verður goldið.

§ 26.

Meirvirðisavgjald, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting.

Til § 26

Í § 26 eru ásettar reglur um at meirvirðisgjald, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting.

Við hesum slepst undan at fara til Føroya Rætt og fáa grundarlag fyri úttøku hvørja ferð at meirvirðisgjald, ið er fallið til gjaldingar, ikki verður goldið.

Í førum, tá ið virki ikki senda inn meirvirðisgjaldsuppgerð, kann tollvaldið sambært § 21, 3. stk. áseta meirvirisgjaldstilsvarið.

Ásetingin verður hereftir grundarlag fyri panting sambært § 26.

X. Avgjald av innflutningi úr øðrum londum

§ 27.

Vørur, ið verða innfluttar úr útlondum, eru avgjaldsskyldugar í samband við innflutningin. Avgjaldið verður avroknað sambært reglunum í 7. kapitli í løgtingslóg um toll, ið er galdandi samsvarandi sambært hesi lóg.

2. stk. Avgjaldið er 20% av einum virði, ið er ásett samsvarandi reglunum um tollvirðið á virðistollskyldugum vørum, møguliga við tolli og øðrum avgjaldi løgdum aftrat, sum skulu gjaldast í samband við innflutning, undantikið avgjaldið smb. hesi lóg.

3. stk. Avgjaldsfrítøka kann játtast við innflutning av vørum í sama mun og undir somu treytum sum ásettar eru um frítøku sambært tolllógini §§ 6, 7 og 9.

4. stk. Flogfør og skip upp á 5 GT og meira, undantikið sportsflogfør og stuttleikafør, kunnu innflytast avgjaldsfrítt.

5. stk. Tíðindabløð kunnu innflytast avgjaldsfrítt. Útlendsk tíðarrit, ið koma beinleiðis til haldaran, kunnu eisini innflytast avgjaldsfrítt.

6. stk. Listamenn kunnu avgjaldsfrítt innflyta egin listaverk av tí slagnum, ið hoyrir undir vøruflokk 9701-9703 í toll- og vøruskránni.

7. stk. Í samráð við nevndina, ið er umrødd í § 35, kann landsstýrð, undir heilt serligum umstøðum loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum í øðrum førum enn teimum, sum nevnd eru í 3-6 stk.

8. stk. Vørur, ið fyribils verða útfluttar við tí fyri eyga at endurinnflyta tær eftir tilevning, virking, innballing, umvæling ella reingerð, kunnu av Toll- og Skattstovu Føroya sambært nærri ásettum treytum loyvast at verða avgjaldsavgreiddar við 20% av útreiðslunum, í hesum eru sendingar- og tryggingarútreiðslur v.m., við tilevningina, sum er gjørd uttan fyri landið íroknað møguligan toll og aðrar útreiðslur sum nevnt í 2. stk.

Til § 27, 1. og 2. stk.

Kjarnan í meirvirðisgjaldslógini er, at sama avgjald skal rindast fyri vørur og tænastur, ið verða innfluttar, sum fyri vørur og tænastur, ið sambært meirvirðisgjaldslógini eru avgjaldsskyldugar við innanlands sølu.

Er ein vøra sostatt avgjaldsfrí, er avgjaldsfrítøkan eisini galdandi við innflutning.

Reglurnar um meirvirðisgjald av innflutningi úr útlondum eru í § 27 í meirvirðisgjaldslógini, ið viðvíkur innflutningi av vørum, og í § 28 í lógini, sum gevur landsstýrinum heimild til at áseta reglur um, í hvønn mun meirvirðisgjald skal gjaldast við keyp av tænastum í útlondum.

Fyri vørur, ið verða innfluttar, verður meirvirðisgjald roknað av tollvirðinum, íroknað toll og omnur gjøld, ið skulu gjaldast í samband við innflutning. Í tollvirðinum eru m. a. sendingar- og tryggingarkostnaður, ið kemur aftrat, til vøran er komin til landið (tolløkið).

Úr ein vøra, ið verður innflutt, tollfrí sambært tolllógini og avgjaldsfrí sambært lóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi, skal meirvirðisgjald rindast av tollvirðinum. Tað er tað virði sambært tolllógini § 11, ið tollur skal roknast av, um vøran er tollskyldug.

Avgjaldið verður avroknað sambært reglunum í 7. kapitli í tolllógini. Tað merkir, at virki, ið hava tollkredit, eisini fáa kredit uppá meirvirðisgjald av innflutningi.

Ástan landsstýrisins er, at skipanin viðvíkjandi tollkreditti, sum í dag fevnir um toll, innflutningsgjald og avgjald á framleiðslu og innflutningi, eisini verður

galdandi fyri meirvirðisgjald av innflutningi, ið kemur í staðin fyri innflutningsgjaldið.

Til § 27, 3. stk.

Meirvirðisgjaldsfrítur innflutningur av vørum kann fara fram í sama mun og undir somu treytum, sum ásett fyri tollfrítøku sambært §§ 6, 7 og 9 í tolllógini.

Hesar greinar áseta, at ferðagóðs, flytigóðs, gávupakkar, vistir og vørur, ið vera innfluttar til góðskingar, kunnu flytast inn uttan at rinda meirvirðisgjald.

Reglan ger tað neyðugt at gera ávísar broytingar í nevndu greinum í tolllógini.

Til § 27, 4. stk.

Flogfør og skip, ið eru 5 GT og meiri, kunnu innflytast meirvirðisgjaldsfrítt, javnber § 27, 4. stk. Hetta er tó ikki galdandi fyri stuttleikabátar og sportsflogfør.

Til § 27, 5. stk.

Tíðindabløð kunnu innflytast meirvirðisgjaldsfrítt javnber § 27, 5. stk.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um tíðindabløð, ið verða innflutt sum mikrofilmur.

Harumframt kunnu útlendsk tíðarrit, ið koma beinleiðis til haldaran, innflytast meirvirðisgjaldsfrítt, javnber § 27, 5. stk. Samlaðar sendingar, ið innihalda liðugt adresserað tíðarrit til serstaka postumbering, koma eisini undir tílíkan innflutning.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um hald av útlendskum tíðarritum, ið verða innflutt sum mikrofilmur. Í hesum sambandi verða eisini magnetbond, ið innihalda greinar til tíðarrit ella yvirlit yvir tílíkar greinar mett sum tíðarrit.

Til § 27, 6. stk.

Listaverk, ið listamaðurin sjálvur eigur av tí slagnum, ið hoyrir undir vøruflokk 9701-9703 í toll- og vøruskránni, kunnu innflytast meirvirðisgjaldsfrítt, javnber § 27, 6. stk. Meirvirðisgjaldsfríi innflutningurin er treytaður av, at listaverkini verða tollavgreidd av viðkomandi listamanni sjálvum (í hansara navni). Meirvirðisgjaldsfrítøkan er tó ikki treytað av, at listamaðurin er til staðar við tollingina, ella at hann er her á landi.

Upprunaligar standmyndir (skulpturar) undir vøruflokki 9703 verða í ávísum førum framleiddar við stoyping ella tílíkum uttanlands, grundað á eina fyrimynd ella upprunaavstoyping (oftа í minni støddd), sum listamaðurin hevur til hetta endamál. Tílíkar upprunaligar standmyndir - herímillum eisini fyrimyndin, upprunaavstoypingin - kunnu innflytast meirvirðisgjaldsfrítt av listamanninum sjálvum.

Verða listaverk innflutt av listaframsýningum, listaverkssølum o. t., skal meirvirðisgjald rindast sambært vanligu reglunum í lógini.

Til § 27, 7. stk.

Landsstýrið kann sambært § 27, 7. stk. í lógini í samráð við meirvirðisgjaldsnevndina, tá ið heilt serligar umstøður tala fyri hesum, loyva meirvirðisgjaldsfríum innflutningi av vørum í øðrum førum enn teimum í § 27, 3-6 stk. nevndu.

Hesar reglur viðvíkja kappingarneutralitetinum.

Sum vanligt dømi um undir hvørjum umstøðum meirvirðisgjaldsfrítøka kann verða játtað, kann nevnast innflutningur hjá sjúkrahúsi av útgerð í førum, har útgerðin er givin sjúkrahúsinum sum gáva frá einum vælgerandi stovni ella felagsskapi. Meirvirðisgjaldsfrítøkan er gjørd treytað av, at samsvarandi útgerð ikki verður framleidd her á landi.

Til § 27, 8. stk.

Sambært hesi reglu kann meirvirðisgjald av vørum, ið verða endurinnfluttar aftaná viðgerð, tilevning, pakking, umvæling ella reingerð í útlandi, roknast av útreiðslunum av gjørdari viðgerð v.m. íroknað toll og møgulig gjøld, ið skulu rindast við innflutning.

Meirvirðisgjald av innflutningi verður avroknað sambært reglunum í kap. 7 í tolllógini.

§ 28.

Landsstýrið kann áseta reglur um, at tann, sum í útlondum keypir avgjaldsskyldugar tænastur til at nýta her á landi, skal rinda 20% av samsýningini fyri viðkomandi tænastur.

Til § 28

Sambært § 28 kann landsstýrið áseta reglur um, at tann, sum í útlandi keypir meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur at nýta her á landi, skal gjalda meirvirðisgjald fyri umrøddu tænastur.

Tílíkar reglur verða ásettar í kunngerð um meirvirðisgjald av ávísum tænastum, ið verða seldar til útland ella keyptar í útlandi. Hetta er sama kunngerð, sum er umrødd undir viðmerkingum til §12, 2, stk.

Reglurnar hava sum endamál at fastleggja latingarstaðið fyri fleiri ítøkiligar tænastur, soleiðis at tað verður tryggjað at meirvirðisgjald í øllum førum verður goldið við lating av tænastum yvir um landamørk.

Við keypi av meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í útlandi skal keyparin í ávísum førum gjalda meirvirðisgjald til landskassan. Hvørjar tænastur hetta er galdandi fyri verður nevnt í kunngerð.

§ 1 í kunngerðini kemur at fevna um hesar tænastur:

a. Heil ella lutfalslig avhending av upphavsrætti, patentrættindum, licensrættindum, rætti til vørumerki, felagsmerki og mynstur og av øðrum tílíkum rættindum.
b. Tænastur viðvíkjandi reklamu.
c. Tænastur frá ráðgevandi virksemi, verkfrøðingum, prosjekteringsvirksemi, advokatum og grannskoðarum og aðrar tílíkar tænastur; dátuviðgerð og upplýsing.
d. Tænastur frá vikarstovum.
e. Skylda til heilt ella lutfalsliga at lata vera við at reka vinnuligt virksemi ella at nýta eitt av teimum rættindum, ið eru nevnd í hesi grein.
f. Tænastur, ið verða gjørdar av millumonnum, sum handla í navni hjá øðrum og fyri rokning hjá øðrum, um so er at teirra virksemi viðvíkur lating av tílíkum tænastum, sum eru umrøddar í hesi grein.
g. Útleiga av leysoyrafæ, undantikið flutningsfør av øllum sløgum.

§ 2 í kunngerðini kemur at fevna um hesar tænastur

a. Tænastuveitingar viðvíkjandi fastari ogn, ið er her á landi, herímillum tænastur frá ognarmeklara, ognarhandlara v. fl., og prosjekterings- og ráðgevandi tænastur.
b. Tiltøk v.m. innan ítrótt, undirhald, undirvísing, vísind v. m., um so er, at tiltøkini eru umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni, og tænastan veruliga verður gjørd her á landi.
c. Arbeiði gjørt á leysoyrafæ her á landi.
d. Serkøn virðismeting av leysoyrafæ her á landi, um so er, at virðismetingin er umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni.

Eitt útlendsk virki, ið her á landi selur tær tænastur, sum eru nevndar í kunngerðini § 2, skulu meirvirðisgjaldsskrásetast og rinda meirvirðisgjald, um sølan fer upp um 20.000 kr. árliga.

Tá ið metast skal, um keyparin skal rinda landskassanum meirvirðisgjald, verður munur gjørdur á, um keyparin er meirvirðisgjaldsskrásett virki ella ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki ella einstaklingur.

Við keyp av tænastum, ið eru nevndar í §§ 1 og 2 í kunngerðini, skal skrásett virki ikki rinda meirvirðisgjald til landskassan, um virkið fult út kann rokna meirvirðisgjald av samsvarandi keypi her á landi við í meirvirðisgjald av keypi.

Um virkið hevur lutfalsligan ella als ongan frádráttarrætt fyri tílík keyp, er virkið umfevnt av teimum reglum, ið eru galdandi fyri ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki og einstaklingar. Um virki hevur lutfalsligan frádráttarrætt, kann tann parturin av meirvirðisgjaldi á keyptum tænastum, sum frádráttarrættur er

fyri, roknast við í meirvirðisgjald av keypi í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiði, tá ið meirvirðisgjald av keypinum skal fráboðast tollvaldinum.

Ikki skrásett virki og einstaklingar skulu rinda meirvirðisgjald av teimum í kunngerðini § 1 nevndu tænastum, ið verða keyptar frá virkjum uttan fyri Føroyar.

Keypir ikki skrásett virki ella einstaklingur tænastur av tí slagnum, ið er nevnt í kunngerðini § 2, skal meirvirðisgjald altíð rindast landskassanum.

Er útlendski seljarin eitt meirvirðisgjaldsskrásett virki her á landi, verður meirvirðisgjald goldið seljaranum í samband við keypið.

Meirvirðisgjald skal tó ikki gjaldast, um tænastan barturav verður nýtt uttanfyri Føroyar.

Tann, sum sambært reglunum, ið verða ásettar í kunngerð, skal gjalda meirvirðisgjald, skal gera hetta grundað á søluprísin fyri keyptu tænasturnar. Uppí samsýningina skulu roknast tær útreiðslur v. m., sum keyparin skal rinda seljaranum fyri at fáa tænasturnar latnar.

Viðvíkjandi edv-tænastum á disklum, ið verða innfluttir á teldu, skal meirvirðisgjald rindast av allari samsýningini, tvs. bæði fyri diskil og tað, ið tað hevur kostað at gera skipanina.

Rindar keyparin við øðrum enn peningi (býtishandil), skal meirvirðisgjald rindast av einum virði, sum samsvarar við vanliga søluprísin hjá útlendska seljaranum.

Eru felags áhugamál millum keypara og seljara, soleiðis, at báðir partar hava árin á virksemi hjá hvørjum øðrum, skal meirvirðið samsvara við tað virði, sum hevði verið galdandi, um eingi felags áhugamál vóru.

Tann, sum í útlondum keypir tænastu, ið meirvirðisgjald skal rindast av, skal áðrenn 8 dagar aftaná, at avtala er gjørd við lataran, boða tollvaldinum frá hesum.

Meirvirðisgjald verður goldið í samsvari við reglurnar í § 22. Tvs. tað skal vera goldið í seinasta lagi 25 dagar aftaná, at tænastan er innflutt.

XI. Eftirlitsreglur

§ 29.

Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild til at kanna høli, ið verða nýtt í samband við raksturin av skrásetingarskyldugum virkjum, og til at kanna vøru á goymslu, handilsbøkur og annað roknskapartilfar og brævaskifti v. m. hjá virkjunum.

2. stk. Handhavarin og starvsfólkið á virkinum skulu veita Toll- og Skattstovu Føroya neyðuga vegleiðing og hjálp, tá kanningar sum nevndar í 1. stk. verða gjørdar.

3. stk. Tilfarið, ið er nevnt í 1. stk., skal eftir áheitan frá Toll- og Skattstovu Føroya latast ella sendast Toll- og Skattstovu Føroya.

Til § 29

Tollvaldið hevur rætt at gera eftirlit í hølum, ið verða nýtt í samband við rakstur av skrásetingarskyldugum virksemi, t. d. handils-, framleiðslu-, skrivstovu- og goymsluhøli.

Tollvaldið hevur harumframt loyvi at kanna vørugoymslu, handilsbøkur, annað roknskapartilfar og brævaskifti v. m. hjá virkjum.

Roknskapartilfar og brævaskifti v. m. hjá virkjum, skal, tá ið tollvaldið biður um tað, útflýggjast ella sendast tollvaldinum.

Rættur til eftirlit fevnir um alt roknskapartilfar, so sum ársroknskap, roknskaparbøkur, journalir, leysblaðabøkur við tilhoyrandi fylgiskjølum, kontokort og annað tílíkt. Harumframt fevnir hetta um kladdubøkur og aðrar hjálpibøkur, t. d. ordrabøkur, avtalubøkur, bíleggingarbøkur, goymslubøkur, arbeiðsseðlar, vikuseðlar og goymslueftirlitskort.

Ordrabøkur o. t. eru umfevndar av rætti til eftirlit, hóast tær ikki innihalda viðmerkingar um innkomnan pening.

Um virkið nýtir grannskoðanarprotokol, er hendan eisini umfevnd av rætti til eftirlit.

Í virkjum, ið nýta edv at føra roknskap, fevnir rættur til eftirlit eisini um skriv, ið lýsa skipanirnar v. m. og magnetbond og aðrar dátuberar.

Orðingin "brævaskifti v.m." fevnir um einhvønn hátt av handilsbrævaskifti, so sum móttikin brøv og avrit av sendum brøvum og sáttmálar og aðrar skrivligar avtalur.

Eftirlit kann bert gerast í privatum íbúðum, tá loyvi er fingið frá handhavaranum, ella tá ið rættarúrskurður er gjørdur hesum viðvíkjandi.

Handhavarin á virkinum og teir persónar, ið arbeiða á virkinum, skulu veita tollvaldinum neyðuga vegleiðing og hjálp, tá ið eftirlit er.

Viðkomandi hava sostatt skyldu at geva frágreiðing um keypsviðurskifti, framleiðsluviðurskifti og søluviðurskifti og at geva upplýsing um, hvussu roknskapurin er lagdur til rættis, hvørjar bøkur ið verða førdar, hvørjar innanhýsis eftirlitsskipanir eru osfr. Skylda er eisini at upplýsa, hvør ið er grannskoðari hjá virkinum.

Virkið hevur harumframt skyldu til, tá ið tollvaldið biður um tað, at gera upp vørugoymslu og kassapening.

Roknskapartilfar og brævaskifti v. m. hjá virkinum skal eftir áheitan frá tollvaldinum útflýggjast ella sendast tollvaldinum.

Skylda at útflýggja ella senda fevnir um alt roknskapartilfar v. m., sum er umfevnt av rætti til eftirlit, herímillum grannskoðanarprotokollin.

Skylda at útflýggja fevnir eisini um roknskapartilfar v. m., ið er hjá triðjamanni (t. d. grannskoðara ella roknskaparráðgeva). Hetta er galdandi, eisini um viðkomandi triðinaður hevur afturhaldsrætt yvir tilfari, t. d. orsakað av óuppgjørdum fíggjarligum viðurskiftum.

Skylda at útflýggja er bert galdandi fyri roknskapartilfar v. m. hjá virkinum. Tilfar, sum er gjørt ella fingið til vega av grannskoðara, og sum ikki hevur verið í ognarhaldi hjá virkinum, hevur virkið ikki skyldu at útflýggja.

Verður roknskapartilfarið móttikið frá triðjamanni, fær hann tað aftur aftaná nýtslu.

§ 30.

Latarar til skrásetingarskyldug virki skulu eftir áheitan geva Toll- og Skattstovu Føroya upplýsingar um teirra latingar av vørum og tænastum til hesi virki.

2. stk. Vinnurekandi skulu eftir áheitan geva Toll- og Skattstovu Føroya upplýsingar um teirra keyp av vørum og tænastum til virki .

3. stk. Peningastovnar, herímillum postgiroskrivstovan og advokatar og onnur, ið taka ímóti miðlum til umsiting ella sum vinnuliga læna út pening, skulu eftir áheitan geva Toll- og Skattstovu Føroya eina og hvørja upplýsing um teirra búskaparligu viðurskifti við navnfest skrásetingarskyldug virki.

4. stk. Toll og Skattstova Føroya hevur heimild til at kanna vøru á goymslu v.m. hjá virkjum, ið eru nevnd í 1. og 2. stk. og til at skoða sáttmálar v. m. hjá virkjum, ið fíggja skrásett virki.

Til § 30

Tey, ið lata til skrásetingarskyldug virki, skulu eftir áheitan geva tollvaldinum upplýsing um latingar av vørum og tænastum til hesi virki.

Tollvaldið hevur rætt at gera eftirlit á viðkomandi virkjum, hóast hesi ikki eru skrásett.

Vinnurekandi skulu eftir áheitan geva tollvaldinum upplýsingar um keyp av vørum og tænastum til virkið.

Tollvaldið hevur rætt at gera eftirlit á viðkomandi virkjum.

Peningastovnar, herímillum postgirostovan, og advokatar og onnur, ið móttaka ognir, pening, o. a. til umsiting, ella sum vinnuliga lána út pening, skulu eftir áheitan geva tollvaldinum eina og hvørja upplýsing um teirra fíggjarligu viðurskifti við navnfest skrásetingarskyldug virki.

Upplýsingarskyldan fevnir um t. d. upplýsingar um broytingar í innskots- og lánikonti, um drignar og innsettar kekkar, um diskonteraðar vekslar og um støddina á lánum.

Tollvaldið hevur somuleiðis rætt at skoða sáttmálar v. m. hjá virkjum, ið fíggja skrásett virki.

§ 31.

Almennir myndugleikar skulu eftir áheitan geva Toll- og Skattstovu Føroya eina og hvørja upplýsing til brúk fyri skráseting av virkjum og til eftirlits við gjalding ella afturgjalding av avgjaldinum.

2. stk. Løgreglan veitir Toll- og Skattstovu Føroya hjálp sambært reglum, ið verða ásettar eftir samráðing millum landsstýrið og landfútan.

Til § 31

Almennir myndugleikar hava skyldu til eftir áheitan at geva tollvaldinum eina og hvørja upplýsing at nýta við skráseting av virkjum og eftirliti við gjalding ella afturgjalding av meirvirðisgjaldi.

Líkningarráðið skal geva upplýsingar um viðurskifti av týdningi fyri eftirlit við meirvirðisgjaldi, sum teir verða varir við undir eftirlitið.

Henda regla gevur heimild at útbyggja eitt samarbeiði, ið eigur at vera millum tollvaldið og líkningarráðið.

Víst verður til § 38, 2. stk. har líkningarráðið somuleiðis kann fáa upplýsingar frá tollvaldinum.

Neyðugt verður í hesum sambandi at broyta § 151 í skattalógini og at orða hana á sama hátt sum § 38, 2. stk., soleiðis at tollvaldið ikki verður mett sum óviðkomandi.

Tollvaldið skal vitja og leiðbeina nýskrásett meirvirðisgjaldsskyldugt virki, um tollvaldið metir, at tørvur er á leiðbeining, ella um virkið biður um leiðbeining.

Leiðbeining til eitt virki fevnir um eina gjøgnumgongd av teimum meirvirðisgjaldsreglum, ið eru viðkomandi fyri virkið, og krøvunum ið standast av hesum til at leggja fram roknskap.

Roknskapareftirlit verður gjørt fyri at taka støðu til samlaðu framløguna av roknskapi og meirvirðisgjaldsavrokning hjá virkinum fyri eitt langt tíðarskeið.

Eftirlitið verður gjørt við at vitja virkið, og vanliga eigur ársroknskapurin at vera gjøgnumgingin fyri seinastu 4 árini, og roknskaparframløgan verður grannskoðað fyri ein stytri ella longri part av hesum tíðarskeiði.

Eftirlitið kann eisini gerast á tann hátt, at virkið verður biðið um at senda inn ársroknskapirnar fyri 4 seinastu árini og fylgiskjøl fyri eitt av hesum árum til gjøgnumgongd hjá tollvaldinum.

Útgjaldingareftirlit verður gjøgnumført fyri at taka støðu til, um ein ítøkilig upphædd kann útgjaldast virkinum. Tílíkt eftirlit fer fram, tá ið virkið gevur upp eitt negativt avgjald. Útgjaldingareftirlit verður vanliga gjørt við at vitja virkið, áðrenn útgjalding fer fram.

Sovorðið eftirlit kannar bert ítøkilig viðurskifti, sum hava gjørt, at avgjaldið í einum tíðarskeiði er negativt.

Roknast má tí við, at hesi eftirlit verða tey, ið koma at krevja mest arbeiðsorku.

Sostatt kannar útgjaldingareftirlitið ikki, um vanliga meirvirðisgjaldsavrokningin hjá virkinum annars er røtt. Eitt seinni roknskapareftirlit fevnir tí møguliga eisini um tíðarskeiðið viðvíkjandi negativu meirvirðisgjaldsfráboðanini og undanfarin tíðarskeið, ið roknskapareftirlit er gjørt við.

§ 32.

Verður staðfest, at eitt virki hevur givið skeiva fráboðan sambært § 20, 1. stk., soleiðis at virkið hevur goldið ov lítið avgjald ella fingið útgoldið ov nógv í endurrindan, verður skylduga upphæddin kravd frá virkinum til gjaldingar í seinasta lagi 14 dagar eftir kravið. Sama er galdandi, tá eitt virki ikki hevur latið uppgerðina inn, og tá fyribils ásetta avgjaldsskyldan sambært § 21, 3. stk., hevur verið ov lítil.

2. stk. Kann støddin á avgjaldsupphæddini, sum virkið skyldar, ikki gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum, kann Toll- og Skattstova Føroya gera eina metta áseting av avgjaldinum. Sama er galdandi, um eitt virki hevur fingið ov nógv í avgjaldsendurrindi og støddin av tí upphædd, sum virkið tí skal afturgjalda, ikki kann gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum. Avgerðin skal innihalda upplýsingar um møguleika at klaga sum nevnt í 3. stk.

3. stk. Eitt avgerð sambært 2. stk. kann av einum virki leggjast fyri nevndina, sum er umrødd í § 35. Áheitan um at leggja fyri nevndina skal vera fráboðað Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 4 vikur aftan á, at virkið er kunnað um ásetingina.

4. stk. Verður avgjaldið ikki goldið rættstundis, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá 1. í tí mánaði, sum virkið skal gjalda upplæddina í, tó í minsta lagi 100 kr.

Til § 32

Um eitt virki hevur givið órætta meirvirðisgjaldsfráboðan, soleiðis at virkið hevur goldið ov lítið meirvirðisgjald ella fingið ov nógv útgoldið í endurgjaldi, verður skylduga upphæddin uppkravd frá virkinum til gjaldingar í seinasta lagi 14 dagar aftaná, at kravt er. Sama er galdandi, tá ið eitt virki ikki hevur sent inn meirvirðisgjaldsfráboðan, og tað meirvirðisgjald, sum tollvaldið sambært § 21, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini fyribils hevur ásett, hevur verið ov lágt.

Rætt meirvirðisgjald verður gjørt upp grundað á roknskapin hjá virkinum, í tann mun, hesin kann góðtakast sum uppgerðargrundarlag.

Kann roknskapurin hjá virkinum ikki metast at vera nóg gott grundarlag fyri eini neyvari uppgerð av meirvirðisgjaldi, kann hetta ásetast út frá einari meting.

Um skylduga meirvirðisgjaldsupphæddin ikki verður goldin til tíðina, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá 1. í tí mánaði, sum upphæddin skal gjaldast virkinum í, tó í minsta lagi kr. 100.

Sambært lóg nr. 274 frá 22. desember 1908 um fyrning av ávísum krøvum, er ein 5 ára fyrningarfreist vanliga galdandi fyri skatta- og avgjaldskrøv.

Fyrningarfreistin fyri meirvirðisgjaldskrøv verður sum meginregla roknað frá tí degi, tá ið upphæddin kundi havt verið kravd goldin, um rætt hevði verið fráboðað, tvs. frá seinasta rætta gjaldingardegi.

Lóg nr. 274 frá 22. desember 1908 um fyrning av ávísum krøvum inniheldur í § 3 eina reglu um fyribils fráseting (suspensión) av fyrningini.

Henda regla kann nýtast í málum, har tollvaldið sambært einari ítøkiligari meting ikki hevur kunnað verið vitandi um kravið. Fyrningarfreistin verður í tílíkum førum ikki roknað, fyrrenn frá tí løtu, tá viðurskiftið er staðfest, og kravið er gjørt upp.

Um tollvaldið er farið undir ella hevur ætlað at fara undir roknskapareftirlit, áðrenn fyrning hendi, men málið hevur varað langa tíð, orsakað av at virkið hevur seinkað málið (t. d. við ikki at vilja útflýggja roknskapartilfar ella hjálpa við eftirlit í virkinum), verður fyrningarfreistin longd við tí tíð, sum virkið hevur seinkað málið við.

Í førum har meirvirðisgjaldsundandráttur, sum er fyrnaður, er staðfestur, verða fyrnaðu upphæddirnar sundurgreinaðar.

Viðvíkjandi upphæddum, sum eru fyrnaðar, fellur eisini kravið um rentur burtur.

Í málum, sum viðvíkja meirvirðisgjaldsundandrátti, ið lutfalsliga er fyrnaður, ella um fyrning fer at gera seg galdandi meðan málið verður viðgjørt, skal tollvaldið syrgja fyri, at fyrningin verður avbrotin.

Fyrning kann m.a. avbrótast á tann hátt, at virkið letur inn eina eftiruppgerð, ella at panting verður framd av Føroya Gjaldstovu.

Setir eitt virki seg upp ímóti avgerð hjá tollvaldinum um støddina á meirvirðisgjaldi ella um meirvirðisgjaldsskylduga virðið v. m. og vil hava avgerð inn fyri hægri fyrisitingarligt rættarstig, er kæran vanliga ikki útsetandi, hvat uppgerð hjá tollvaldinun og krevjing av undandrignum meirvirðisgjaldsupphæddum viðvíkur.

Í summum málum verður tað kortini ikki mett at vera rímiligt at fremja úttøku, fyrrenn nevndin sambært § 35 hevur tikið avgerð. Tað at skjóta málið inn til avgerð í nevndini, avbrýtur tó ikki fyrningarfreistina. Í tílíkum málum, tá ið virkið ikki vil geva eftiruppgerð, og tá ið tað má væntast frammanundan, at meirvirðisgjaldskravið heilt ella lutfalsliga verður fyrnað, áðrenn nevndin hevur tikið avgerð, kann virkið sleppa undan at fremja úttøku við skrivliga at siga frá sær møguleikan at kunna gera fyrningarmótmæli galdandi (avbrótingaráheitanin).

Tað at skjóta eina metta áseting inn fyri meirvirðisgjaldsnevndina, útsetir heldur ikki fyrnigarfreistina. Í tílíkum málum kann virkið eisini sleppa undan at gera úttøku við skrivliga at siga frá sær møguleikan at kunna gera fyrningarmótmæli galdandi.

Avbrótingaráheitan er bindandi fyri 1 ár frá tí degi, hon verður skrivað undir.

Kann støddin á meirvirðisgjaldi, sum eitt virki skal gjalda, ikki gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum, kann tollvaldið sambært § 32, 2. stk. gera eina metta áseting av meirvirðisgjaldinum. Sama er galdandi, um eitt virki hevur fingið ov nógv meirvirðisgjald endurrindað, og støddin á tí upphædd, sum virkið tí skal gjalda aftur, ikki kann gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum.

Tollvaldið hevur við hesum myndugleika til at gera mettar ásetingar.

Mettar ásetingar fevna um alt meirvirðisgjald hjá einum virki fyri viðkomandi tíðarskeið og ikki bert fyri tann partin av meirvirðisgjaldi, sum restaði í, tá ið fráboðað varð.

Virkið eigur at verða kallað til fundar hjá tollvaldinum um mettu ásetingina. Tó eigur áseting at vera gjørd, hóast virkið ikki kemur til fundar.

Virkið kann skjóta mettu ásetingina fyri meirvirðisgjaldsnevndina. Áheitan um hetta skal vera latin tollvaldinum í seinasta lagi 4 vikur aftaná, at virkið er kunnað um ásetingina.

Virkið kann fáa atgongd til munnliga at bera málið fram fyri meirvirðisgjaldsnevndina.

XII. Revsireglur

§ 33.

Við bót verður tann revsaður, ið við vilja ella av grovum ósketni:

- **a.** Gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella ikki gevur upplýsingar at nýta til avgjaldseftirlitið ella eftirlit við útgjaldingum sambært § 24.
- **b.** Brýtur § 5, 1. stk., 2 stk., 1. punktum ella 5. stk., § 10, 3. stk., § 12, 6. stk., 2. punktum, § 13, 4. stk., 2. punktum, § 17, 1., 2., 5., 6., 9. ella 11., stk., § 18, 3. stk., § 19, § 20, 1. stk., § 29, 2. ella 3. stk., § 30, 1., 2. ella 3. stk.
- **c.** Letur vera við at gera sum ásett í § 3, 2. stk. ella § 9, 1. stk.
- **d.** Setir til viks treytir, sum eru ásettar sambært § 2, 4. og 5. stk., § 4, 2. stk. og § 12, 2. stk.

2. stk. Í fyriskipanum sambært hesi lóg kann revsing við bót áleggjast tí, sum við vilja ella av grovum ósketni brýtur reglurnar í fyriskipanunum.

3. stk. Tann, sum fremur eitt av nevndu brotum við vilja fyri at fáa avgjald útgoldið úr landskassanum sambært § 24, verður revsaður við bót, hefti ella fongsul upp til 2 ár.

4. stk. Fyri lógarbrot, sum verða framd av partafeløgum, lutafeløgum ella tílíkum, kann sektarábyrgd verða áløgd felagnum sum so.

Til § 33

Tað er revsivert tilætlað ella av grovum ósketni at bróta reglur í meirvirðisgjaldslógini og teimum kunngerðum, ið verða settar í samband við meirvirðisgjaldslógina.

Tann, ið brýtur lógina ella kunngerð við heimild í lógini, kann revsast við sekt. Er lógarbrotið tilætlað fyri at sleppa undan at gjalda meirvirðisgjald til landskassan, kann revsingin hækkað til hefti ella fongsul upp til 2 ár.

Verður lógarbrotið framt av partafelagi, lutafelagi ella tílíkum, kann sektarábyrgd áleggjast felagnum.

Tá ið tollvaldið tekur støði til spurningin um skuld, verða vanligu reglurnar um tilætlan og ósketni nýttar.

Evnisligu revsireglurnar í meirvirðisgjaldslógini eru orðaðar sum ein vanlig revsiregla í § 33, 1. stk. punkt a, ið verður nýtt í førum, har tað innan lógarinnar øki eru givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella upplýsingar eru duldar. Undir hesa reglu koma m.a. meirvirðisgjaldsundandráttir orsakað av skeivum meirvirðisgjaldsfráboðanum.

Revsireglurnar eru harumframt í § 33, 1. stk. litra b, c, og d, í lógini orðaðar soleiðis, at tað nágreiniliga er tilskilað, hvørji onnur lógarbrot ið eru revsiverd.

§ 5, 1. stk.:
Skylda at boða frá virki til skrásetingar hjá tollvaldinum.

§ 5, 2. stk. pkt. 1:
Skylda at skráseta fleiri virki við sama løgfrøðiliga ella likamliga persóni sum eigara undir einum, um serstakur roknskapur ikki verður førdur fyri hvørt einstakt virki.

§ 5, 5. stk.:
Skylda at geva skrásetingarfráboðan í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn farið verður undir virksemi. Skylda at boða frá ognarskifti, leiðsluskifti ella flyting í seinasta lagi 8 dagar áðrenn broyting.

§ 10, 3. stk.:
Forboð móti at tilskila meirvirðisgjaldsupphædd ella tílíkt við sølu av brúktum bilum, ið gjalda meirvirðisgjald sambært § 10, 1. stk. ella § 10, 2. stk.

§ 12, 5. stk. pkt. 2:
Skylda at boða tollvaldinum frá sølu av vørugoymslu, maskinum og øðrum

rakstargøgnum, tá ið avhendingin fer fram sum liður í einari avhending av virkinum ella einum parti av hesum, í seinasta lagi 8 dagar aftaná avhendingina.

§ 13, 4. stk. pkt. 2:
Skylda at útflýggja faktura við lating av vørum í søluumboði ella umboðssølu (kommissión ella konsignatión).

§ 17, 1. stk.:
Krav til útsjónd og innihald á faktura við sølu av vørum og tænastum.

§ 17, 2. stk.:
Skylda at útflýggja kreditnotu m. a. við aftursending av vørum.

§ 17, 5. stk.:
Skylda hjá latara at goyma fakturaavrit v. m.

§ 17, 6. stk.:
Skylda at býta sundur faktura, ið fevnir um meirvirðisgjaldsskyldugar og ikki meirvirðisgjaldsskyldugar vørur og tænastur.

§ 17, 9. stk.:
Forboð móti at ikki skrásett virki tilskila meirvirðisgjaldsupphædd á faktura og skylda at afturgjalda meirvirðisgjald, ið er móttikið av órættum.

§ 17, 11. stk.:
Skylda til við prísáseting at geva til kennar, um prísurin ikki inniheldur meirvirðisgjald.

§ 18, 3. stk.:
Skylda at føra meirvirðisgjaldsroknskap í roknskaparhefti frá tollvaldinum, um vanligur handilsroknskapur ikki verður førdur.

§ 19:
Skylda at goyma roknskapartilfar í 5 ár aftaná endan á roknskaparárinum og skylda til árliga at gera goymsluuppgerð.

§ 20, 1. stk.:
Skylda at boða frá inn- og útgangandi meirvirðisgjaldi í seinasta lagi 25 dagar aftaná endan á hvørjum meirvirðisgjaldstíðarskeiði.

§ 29, 2. stk.:
Skylda at veita tollvaldinum neyðuga hjálp og leiðbeining við eftirlit ella kanning.

§ 29, 3. stk.:
Skylda at lata ella senda tollvaldinum rokнskapartilfar v. m.

§ 30, 1. stk.:
Skylda at geva upplýsingar um latingar til skrásetingarskyldug virki.

§ 30, 2. stk.:
Skylda at upplýsa um keyp av vørum og tænastum til virkið.

§ 30, 3. stk.:
Skylda hjá peningastovnum, advokatum og øðrum, ið reka lánivirksemi ella ognarmekling, til at geva upplýsingar um líggjarlig viðurskifti við navnfest skrásetingarskyldug virki.

Til § 33, 1. stk. c.
Fylgjur av ikki at halda fyriskipanir sambært § 3, 2. stk. um meirvirðisgjaldsskyldu fyri vørur og tænastur, sum verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum.

Fylgjur av ikki at halda fyriskipanir sambært § 9, 1. stk. um áseting av meirvirðisgjaldsskyldugum virði við handil millum virki, ið hava felags áhugamál.

Til § 33, 1. stk. d.
Brot á fyriskipanir sambært § 2, 4. og 5. stk. um undantøk av meirvirðisgjaldsskyldu og brot á fyriskipanir fyri loyvi til meirvirðisgjaldsfrítøku í samband við vælgerandi og almannagagnlig tiltøk.

Brot á fyriskipanir viðvíkjandi meirvirðisgjaldsfrítøku sambært § 4, 2. stk. og brot á fyriskipanir viðvíkjandi meirvirðisgjaldsfrítøku sambært § 12, 2. stk. fyri tænastur, ið verða gjørdar fyri útlendska rokning.

Til § 33, 2. stk.
Sambært § 33, verða fleiri kunngerðir settar, við heimild í lógini, ið áseta revsing við sekt fyri tilætlað brot ella brot av grovum ósketni á kunngerðirnar.

Um eitt av nevndu lógarbrotum er gjørt fyri tilætlað at sleppa undan at gjalda landskassanum meirvirðisgjald, er sambært § 33, 3. stk. møguleiki fyri at revsa við fongsulsrevsing.

Tá ið talan er um serliga grov brot á meirvirðisgjaldslógina, kann ákæra eisini verða reist sambært § 279 í revsilógini (fíggjarsvik).

Í førum, har brot verður gjørt av partafeløgum, lutafeløgum ella tílíkum, er í § 33, 4. stk. í lógini, heimild at áleggja felagnum sum so sektarábyrgd.

§ 34.

Verður lógarbrot mett ikki at føra strangari revsing við sær enn bót, kann Toll- og Skattstova Føroya kunna viðkomandi um, at sakin kann verða avgjørd uttan rættarsókn, um hann viðgongur seg sekan í lógarbrotinum og váttar seg til reiðar innanfyri eina nærri ásetta freist at gjalda eina bót.

2. stk. Viðvíkjandi kunningini, sum er nevnd í 1. stk., koma reglurnar í rættargangslógini um innihald av ákæruriti í løgreglumálum í nýtslu samsvarandi.

3. stk. Verður bótin goldin rættstundis, ella verður hon sambært avgerð innheintað ella avsitin, fellur víðari rættarsókn burtur.

4. stk. Tá sakarmál um lógarbrot nevnd í § 33 verða løgd fyri rættin, verða tey viðgjørd sum løgreglumál. Rættarráðini í rættargangslógini kapittul 72 og 73 kunnu nýtast í sama mun sum í ríkisadvokatmálum.

Til § 34

Sambært § 34 í meirvirðisgjaldslógini kann tollvaldið, tá ið eitt lógarbrot ikki verður mett at føra við sær strangari revsing enn sekt, kunna viðkomandi um, at málið kann verða avgjørt uttan rættarsókn, um hann játtar seg sekan í lógarbrotinum og játtar at gjalda eina í fráboðanini ásetta bót innan eina nærri ásetta freist.

Fráboðanin verður nevnd sektaruppskot og verður givin viðkomandi skrivliga.

Verður bótin goldin innan ásettu freistina, ella játtar viðkomandi skrivliga innan sotnu freist yvir fyri tollvaldinum at vilja gjalda bótina, fellur víðari rættarsókn burtur.

Verður bótin ikki goldin ella viðtikin, verður málið sent til avgerðar í rættinum. Sama hendir, tá ið tollvaldið metir, at viðkomandi, hvat støddini á og umstøðunum í málinum viðvíkur, eigur at verða fongsulsrevsaður, ella at málið annars eigur at verða avgjørt í rættinum.

Flest øll brot á meirvirðisgjaldslógina verða í øðrum londum avgjørd fyrisitingarliga við sektaruppskoti. Fyritreytin fyri, at eitt mál kann avgerast fyrisitingarliga, eigur at vera, at tað ikki verður mett, at lógarbrotið, um tað verður skotið fyri dómstólin, kemur at føra við sær fongsulsrevsing.

Áseting av sektarstøddini er fyri ein part latin upp í hendurnar á tollvaldinum, sum tann myndugleiki, ið umsitir meirvirðisgjaldslógina, og fyri ein part upp til rættin. Tá ið avgerast skal í lógarbrotsmálum, er sum meginregla neyðugt at áseta sektirnar í samsvari við reglurnar í kap. 10 í revsilógini um revsiáseting.

Sambært § 80 í revsilógini skal revsiáseting gerast við atliti til, hvussu grovt lógarbrotið er, og við atliti til upplýsingar um brotsgerðarmannin, herímillum um hansara vanligu persónligu og samfelagsligu viðurskifti, hansara viðurskifti áðrenn og aftaná brotsgerðina og orsøk hansara til at gera hetta.

Áseting av, hvussu stór sektin skal vera, skal harumframt, innan tey mørk, sum atliti til lógarbrotið og ner í § 80 nevndu umstøður annars áseta, gerast við serligum atliti til gjaldsføri hjá viðkomandi, javnber § 51, 3. stk. í revsilógini.

Tann sektarvenja (praksis), ið verður nýtt í málum um brot á meirvirðisgjaldslógina, verður tó, í stóran mun uppbygd sum vanlig sektarskipan, m.a. við atliti til, hvussu nógv mál eru, og hvussu nógv avgerðirnar líkjast. Hetta merkir, at viðvíkjandi brotum, sum koma ofta fyri, verður sekt áløgd eftir støddini á tí upphædd, sum viðkomandi hevur sloppið sær undan.

Tá ið avgerast skal, um tafan er um grovt ósketni ella tilætlan, eru m.a. hesar umstøður av týdningi:

- Serligur misjavni millum tað, ið er givið upp, og veruligu meirvirðisgjaldsupphæddina.
- Vantandi skráseting av sølu v. m.
- Tað at sleppa sær undan at føra meirvirðisgjaldsroknskap.
- Grovt óskil í roknskapinum annars.
- Vantandi vilji at laga seg eftir reglum og ávísingum.

Eru fleiri umstøður í einum ítøkiligum máli, kann frávik verða gjørt frá vanligu sektini, soleiðis at sektin verður lækkað, alt eftir hvussu serligu umstøðurnar eru háttaðar.

Vanliga sektin verður t.d. lækkað, um talan er um lógarbrot á serliga fløkjasligum økjum í lógini.

Boðar tann, sum hevur sloppið sær undan at gjalda meirvirðisgjald, sjálvur frá hesum, eigur málið sum meginregla at vera avgjørt uttan sekt.

Hetta fevnir um tilburðir, tá ið eitt virki sjálvt ella advokatur/grannskoðari vegna virkið vendir sær til tollvaldið við áheitan um at rætta eitt mistak.

Henda sjálvfráboðan fevnir eisini um tilburðir, tá ið virkið sjálvt hevur rættað mistakið og tekur upphæddina við í einari seinni avgjaldsuppgerð, ella tá ið tað verður staðfest, at virkið, áðrenn farið verður undir eftirlit, sjálvboðið er farið í holt við grannskoðan av roknskapinum við tí fyri eyga at rætta mistak í roknskapinum. Í seinast nevnda føri er tað tó samstundis ein treyt, at tað verður mett, at líkt var til, at virkið sjálvt, tá ið grannskoðanin varð liðug, fór at boða tollvaldinum frá staðfestum mistøkum ella fór at rætta upphæddirnar í einari seinni avgjaldsuppgerð.

XIII. Aðrar reglur

§ 35.

Landsstýrið setir eina nevnd við 3 limum, ið hava fjølbroyttan kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti.

2. stk. Í minsta lagi ein av limunum í nevndini skal vera løgfrøðingur og ikki

hava sítt dagliga yrki hjá tí almenna, og verður hesin, ella eru teir fleiri, ein av hesum, formaður í nevndini.

3. stk. Við viðgerð av málum, ið sambært nevndarinnar metan krevja serligan starvsgreinaligan, tøknifrøðiligan ella handilsligan kunnleika, kann nevndin boðsenda kønum ráðgevum.

4. stk. Nevndin hevur endaliga fyrisitingarliga avgerð um:

a. Spurningar um vavið á avgjaldsskylduni.
b. Spurningar um avgjaldsskylduga virðið.
c. Spurningar um vavið á frítøkuni, sum er nevnd í § 12, 1. stk., punkt f og h, og § 27, 4. og 5. stk.
d. Spurningar sambært § 15, 3. stk. og § 16, 3. stk. viðvíkjandi inngangandi avgjaldi.
e. Spurningar um, hvat ið er alment veitingarvirki sambært § 3, 1. stk., punkt c.
f. Klagur um tær ásetingar, ið sambært § 32, 2. stk. verða gjørdar eftir meting av Toll- og Skattstovu Føroya.

5. stk. Tann, sum hevur biðið nevndina um eina avgerð, kann eftir áheitan fáa atgongd til munnliga at framleggja málið fyri nevndina. Í sovorðnum førum skal umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya eisini hava henda møguleika.

6. stk. Starvsskipanin hjá nevndini og reglur um kunngerð av avgerðum, ið nevndin tekur, verða ásettar av landsstýrinum.

Til § 35.

Royndir frá grannalondum vísa, at ein ávís fyrisiting stendst av at viðgera kærur, ið fyrisitingin hevur tikið í samband við fyrisitingina av meirvirðisgjaldinum. Fleiri undantøk, ið verða gjørd frá meirvirðisgjaldsskylduni, størri verður fyrisitingin.

Neyðugt verður tí at seta eina nevnd, sum skal viðgera avgerðirnar hjá tollvaldinum sambært meirvirðisgjaldslógini.

Fyri at spara umsiting, og tí at meirvirðisgjaldsskipanin er ein partur av toll- og avgjaldsskipanini, sum má síggjast sum ein heild, ið setir ávís krøv til detailkunnleika, samfelagsviðurskifti og fyrisiting annars, er uppskot landsstýrisins, at nevndin verður tann sama sum tann, ið skal viðgera kærur sambært tolllógini.

Skotið verður harnæst upp, at nevndin í førum, tá ið neyðugt er við sakkønari hjálp, kann boðsenda kønum ráðgevum. Hesir hava tó ongan avgerðarrætt.

Nevndin hevur endaligan avgerðarrætt innan fyrisitingina í málum, ið eru nevnd í lógini § 35, 4. stk.

Nærri reglur um starvsskipanina hjá nevndini og reglur um kunngerð av avgerðum, ið nevndin tekur, verða ásettar í kunngerð.

§ 36.

Landsstýrið ásetir reglur um endurrindan av avgjaldi, sum útlendsk virki hava goldið við keyp, tilevning v. m., goymslu ella við flutning av vørum, ið verða útfluttar til útlond.

Til § 36

Reglurnar um at søla til útflutnings kann haldast uttanfyri avgjaldsskyldugu søluna, kann ikki nýtast, tá ið eitt útlendskt virki keypir og fær vøruna her í landinum og útflytir hana sjálvt.

Fyri ikki at gera mun á hesum, í mun til, tá ið eitt virki selur beinleiðis til eitt útlendskt virki, verða reglur ásettar í kunngerð um, at útlendsk virki, ið vinnuligt keypa vørur her á landi og útflyta tær sjálvi, kunnu fáa endurrindað tað faktureraða avgjaldið.

Ferðagóðsreglurnar og reglurnar um útflutning av tænastum, eru umrøddar undir viðmerkingunum til § 12, 2. stk.

§ 37.

Avgjald sambært hesi lóg fer í landskassan.

Til § 37

Til hesa grein er at viðmerkja, at seinastu tíðina hevur nógv verið skrivað um tap landskassans orsakað av tollkreditti, og spurningurin hevur verið: Hvussu kann landskassin tryggja sær at sleppa undan ella at avmarka tapið?

Tað seinasta landsstýrið gjørdi í hesum sambandi var at broyta tollkreditkunngerðina í juni mánaði í 1991, soleiðis at vørumóttakarar skulu seta trygd, ið ongantíð má vera minni enn 100.000 kr. Hetta hevur gjørt, at í dag eru bert umleið 100 viðskiftafólk skrásett í tollkreditinum.

Av tí at meirvirðisgjaldið kemur í staðin fyri innflutningsgjaldið, verður neyðugt at hava eina kredittskipan við innflutning. Ætlan landsstýrisins er tí, at kredittskipanin við innflutning, sum ásett í kunngerðini um tollkreditt, verður galdandi í meirvirðisgjaldinum.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 27, 1. stk.

Eitt av teimum málum, ið eru umrødd í samband við meirvirðisgjald, eru royndirnar frá øðrum londum, ið vísa, at ríkiskassarnir í samband við meirvirðisgjaldið, hava havt stór tap av virkjum, ið ikki avrokna meirvirðisgjald til statskassan. Spurningurin er, hvussu ein kann loysa henda trupulleika.

Tað hevur ikki verið vanligt, at tað almenna á sama hátt sum privatar fyritøkur avsetir móti tapi, men royndirnar bæði her á landi og í øðrum londum prógva, at núgaldandi eftirstøðupolitikkur ikki megnar at loysa trupulleikan við, at eftirstøðurnar hjá tí almenna verða alt størri ár eftir ár. Í Danmørk t. d. eru eftirstøðurnar hjá tí almenna 24 mia. kr.

Landsstýrið hevur kannað ymiskar møguleikar fyri at loysa henda trupulleika og kann upplýsa, at í Íslandi verða virki, ið ikki avrokna meirvirðisgjald til ríkiskassan, stongd, til meirvirðisgjaldið er goldið, ella til virkið er "avviklað". Í Danmørk verður roynt at innkrevja meirvirðisgjald á vanligan hátt, t.v.s. verður ikki goldið, skal revsirenta gjaldast, og málið verður gjørt til eitt eftirstøðumál, úttøka verður gjørd, grundað á avgerðirnar hjá tollvaldinum.

Felags fyri hesar báðar skipanir, ta donsku og ta íslendsku, er, at tær ikki virka fyribyrgjandi. Tað verður ikki farið til verka, fyrrenn skaðin er hendur, og tá er tað næstan altíð ómøguligt at fáa peningin inn.

Ein loysn, ið hevur verið havd á lofti undir viðgerðini av uppskotinum, er ein akontoskipan, ið virkar soleiðis, at øll virki, ið eru skrásett, gjalda eitt ávíst akonto gjald hvønn mánaða. Hetta akontogjald verður roknað út sambært lønarútreiðslunum hjá virkinum og kann afturhaldast sambært skattaskipanini. Tá ið so virkið ger upp meirvirðisgjaldsskyldugu søluna fyri eitt avgjaldstíðarskeið, verður ein uppgerð av akonto inngjaldingini gjørd. Fyrimunurin við hesari skipan er, at hon virkar fyribyrgjandi. Virkini hava áhuga í at koma og avrokna meirvirðisgjald við landskassan, av tí at tey longu hava goldið akontogjald og hava bundnan pening í landskassanum.

Vansin við hesari skipan er, at virki, sum hava stórar lønarútreiðslur, binda stórar upphæddir í landskassanum. Hetta gongur út yvir likviditetin og kappingarføri hjá virkinum. Spurningurin er eisini, um tílík skipan, um hon hevði verið sett í gildi, bert skuldi verið galdandi fyri meirvirðisgjald, ella um ein totalloysn skuldi verið vald, ið eisini skuldi verið galdandi fyri partafelagsskattin. Eisini hetta gongur út yvir likviditetin hjá virkinum.

Ein annar vansi er, at tað krevur eina stóra fyrisiting at hava eftirlit við akontogjaldinum og at avrokna tað, hvørja ferð tá ið meirvirðisgjaldið skal gerast upp.

Ein annar møguleiki er tann, ið eisini var umhugsaður, tá ið tollløgin varð gjørd, og sum Danmørk hevur roynt frá viðvíkjandi innflutningstollkreditinum. Skipanin er tann, at tey virki, ið eru skrásett í skránni, og sum eru meirvirðisgjaldsskyldug, skulu gjalda eina ávísa upphædd av hvørjum gjaldi í eitt grunn. Hesin grunnurin verður solidariskur, skilt á tann hátt, at hevur landskassin eitt staðfest tap av einum av teimum virkjunum, kann landskassin fara í henda grunn og fáa upphæddirnar goldnar.

Kravið er sjálvsagt, at alt er gjørt, ið gerast kann, áðrenn farið verður í grunnin. Neyðugt verður tí at gera eina lóg um at seta á stovn tílíkan grunn og í hesari lóg nágreiniliga at áseta reglur um, nær landskassin kann fáa hesi tap rindað.

Eitt gjald í henda grunn gongur sjálvsagt eisini út yvir likviditetin hjá virkinum, men í og við at gjaldið verður treytað av meirvirðisgjaldsavrokningini, kemur tað ikki at ganga út yvir kappingarføri hjá virkjum, ið útflyta, av tí at meirvirðisgjald ikki verður rindað av útflutningi.

Grunnurin er eisini lættur at umsita, av tí at innjalding í grunnin verður gjørd saman við meirvirðisgjaldinum.

Sambært búskaparligu viðmerkingunum verður inntøka landskassans av meirvirðisgjaldi í 1993 umleið 558 mió. kr.

Verður gjaldið sett til 1/2 % koma sostatt kr. 2,79 mió. í grunn í 1993.

Vísir tað seg aftaná eina tíð, at upphæddin er ov stór, eigur at bera til at seta upphæddina niður.

§ 40.

Virki, ið eru skráseltingarskyldug sambært hesi lóg, og sum hava uppgjørt goymsluna pr. 31. december 1992, og sum hava sent inn uppgerðina áðrenn 1. februar 1993, fáa 100% av innflutningsgjaldinum sambært løgtingslóg nr. 119 frá 23. desember 1991 um innflutningsgjald, ið er goldið fyri vørur, ið eru innfluttar til víðari sølu, og sum ikki eru seldar áðrenn 1. januar 1993, endurgoldið í 1993.

2. stk. Innflutningsgjaldið sambært hesi grein verður endurgoldið í mun til bókførda skattliga virðið á vørugoymsluni og verður útgoldið í 3 pørtum í samsvari við avrokningartíðarskeiðið sambært § 20, fyrstu ferð í samband við annað avrokningartíðarskeið í 1993.

3. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um krøv, ið skulu lúkast, áðrenn aftur rindan sambært hesi grein verður framd.

4. stk. Í kunngerð sett sambært 3. stk. kann landsstýrið áseta, at vørugoymslan skal gerast upp sambært skattligu reglunum um uppgerð av vørugoymslu, og at uppgerðin skal váttast av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

Til § 40

Í samband við, at lóg um meirvirðisgjald verður sett í gildi 1. januar 1993, koma nøkur virki, ið skulu rinda meirvirðisgjald, at hava eina goymslu, ið innflutningsgjald er rindað fyri, orsakað av at vørurnar eru innfluttar áðrenn 1. januar 1993.

Fyri at hesi virki ikki skulu koma at rinda meirvirðisgjald av innflutningsgjaldinum, er ásett ein regla í § 40 um, at virki, ið eru skráseltingarskyldug sambært hesi lóg, og sum hava uppgjørt goymsluna pr. 31. desember áðrenn 1. februar 1993, kunnu fáa 80% av innflutningsgjaldinum sambært løgtingslóg nr. 119 frá 23. desember 1991 endurgoldið í 5 pørtum í 1993, fyrstu ferð í samband við annað avrokningartíðarskeið í 1993, tað er aftaná 15. mai 1993.

Endurgjaldið fylgir avrokningartíðarskeiðinum sambært § 20 og er treytað av at:

1) Virkið hevur goldið innflutningsgjaldið í 1992.
2) Vøran er innflutt til víðari sølu.
3) Vøran ikki er seld í 1992.

Íløgu- og rakstrargøgn koma ikki undir hesa reglu.

Viðvíkjandi rakstri og ilagugøgnum kann vísast til reglurnar, ið vórðu gjordar í tollskipanini, sum kom í gildi 1. februar 1992. Har landsstýrið í samráð við ítnaðarfelagið fann fram til, at ávisar vorur, sum fara at kunna dragast frá í meirvirðisgjaldsskipanini í 1993, skuldu fáa lægri toll samsvart tollskipanini, ið kom í gildi 1. januar 1992.

Hetta var gjørt út frá tí, at mett varð, at annars fóru allar ilagur (investeringar) at steðga í 1992.

Tað er sostatt eingin orsøk til at gera serligar reglur hesum viðvíkjandi.

Eftir at nýggja tollskipanin kom í gildi 1. februar 1992, hevur borið til at gera upp, hvussu stórur partur av teimum óbeinteiðis inntøkunum, ið er innflutningsgjald.

Út frá gongdini í februar, mars og apríl er realistiskt at rokna við, at inntøka landskassans av innflutningsgjaldinum er kr. 19 mió. um mánaðin, ella kr. 228 mió. í 1992.

Verður roknað við at 3/4 av hesum vørum eru seldar í 1992, verður talan um at endurrinda 80% av kr. 57 mió, ella kr. 45,6 mió.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 177/1991: Løgtingslóg um meirvirðisgjald.

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. mai 1992 og eftir 1. viðgerð 3. juni 1992 beint í skattanevndina.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til, nú tá ið so langt er tilbúið, og málið er stórt og víttfevnandi, at skattanevndin verður gjørd til miðlumtingsnevnd hesum máli viðvíkjandi. Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at skattanevndin verður miðlumtingsnevnd viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 177/1991: Løgtingslóg um meirvirðisgjald og leggur álit fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni 1992.

178. Broyting í løgtingslóg um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om dagpenge ved barsel og sygdom.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 25 frá 30. apríl 1987 um dagpening í samband við barnsburð og sjúku, sum broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 2. oktober 1987, løgtingslóg nr. 78 frá 9. juni 1988 og løgtingslóg nr. 76 frá 12. uni 1990, verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 2 verður strikað.
2) Í § 3 verða orðini "eftir § 2" strikaði.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1992.

§ 1.

I lagtingslov nr. 25 af 30. april 1987 om dagpenge ved barsel og sygdom, som ændret ved lagtingslov nr. 86 af 2. oktober 1987, lagtingslov nr. 78 af 9. juni 1988 og lagtingslov nr. 76 af 12. juni 1990 foretages følgende ændringer:

1) § 2 udgår.
2) i § 3 udgår: "ifølge § 2"

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. juni 1992.

Viðmerkingar:

Dagpeningaskipanin veitir fólki dagpening sum endurgjald fyri mista inntøku í samband við sjúku ella barnsburð. Tó kunnu fólk, sum hava aðra vinnuliga inntøku enn lønarinntøku, og fólk, sum í egnum heimi gera húsligt arbeiði fyri í minsta lagi eitt fólk umframt seg sjálvan, tryggja seg í sjálvboðnu dagpeningaskipanini í samband við sjúku ella barnsburð.

Við løgtingslógini um dagpening í samband við barnsburð ella sjúku frá 1987 gjørdist møguligt hjá heimaarbeiðandi kvinnum at fáa dagpening við barnsburð. Upphæddin var tá sett til dagpeningamaksimum. Í 1990 var henda upphædd broytt til 50% av dagpeningamaksimum.

Við hesum uppskoti verður hendan skipan nú strikað. Um vilji er at stuðla familjupolitisk tiltøk, so eigur hetta at verða gjørt í aðrari lóggávu enn í dagpeningalóggávuni.

Tá sparingar skulu fremjast á almannaøkinum er neyðugt at verja øki, har stuðul er harðast tiltrongdur, hóast tað ongantíð er løtt avgerð at skerja í galdandi rættindum.

Men sæð í tí ljósi, at dagpeningaskipanin er ein endurgjaldsskipan fyri mista inntøku orsakað av sjúku ella barnsburði, verður skotið upp, at vent verður aftur til lógargrundarlagið fram til 1987 viðvíkjandi heimaarbeiðandi kvinnum.

Broytingin verður mett at hava við sær eina árliga sparing uppá 9 mió. kr., svarandi til, at í 1992 verður sparingin uml. 4,5 mió. kr.

Landsstýrið metir eisini, at herumframt verður neyðugt at fremja broytingar í galdandi skipan viðvíkjandi barnsburðarfarloyvinum soleiðis, at galdandi reglur, avtalaðar millum løntakarafeløgini og landsstýrið, verða broyttar soleiðis, at barnsburðarfarloyvið goldið av arbeiðsgevara verður 20 viknr, meðan 4 eyka viknr verða at veita yvir dagpeningaskipanina. Slík broyting vil í størri mun javnseta alment sett starvsfólk við tímalønt starvsfólk. Slík broyting kann ikki verða framd í einum sáttmálaskeiði.